| 70 | Skipan millum Føroyar og Lettland um sínamillum fiskirættindi í 1993. | 22-Des | FL | 14-Jan | marknaðarnevnd | 29-Jan | 3-Feb | | 24-0 | 5-Febr. | |
| 71 | Bekendtgørelse nr. 63 af 14. juni 1990 om aftale af 17. maí 1989 mellem den danske regering, Færøernes landsstyri og Grønlands hjemmestyre på den ene side og Det Internationale Havundersøgelsesråd på den anden side | 22-Des | Fl<br>FL | 15-Jan | marknaðarnevnd | 29-Jan | 3-Feb | | 23-0 | 5-Febr | |
| 72 | Avloka av ymsum løgtingslógum. | 22-Des | Fl. | 22-Des | fiskivinnunevnd | 3-Feb | 16/2-23/2 | 26-Feb | 17-0 | 5-Apr. | 33,4-Mar. 93 |
| 73 | Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald. | 21-Des | FL | 22-Des | | | 22-Des | 29 Des | 22-0 | 10-Febr. | 193,30-Des. 92 |
| 74 | Setan av serlækna í barnaskjúkum við heilsuverk Føroya. | 22-Des | T. Niclasen | 20-Jan | alm. og heilsun. | 18-Mar | 23-Mar | | 6-0 | 30-Mar | |
| 75 | Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan. | 29-Des | FL | 30-Des | | | 30-Des | 30-Des | 18-0 | 16-Febr | 194,30-Des. 92 |
| 76 | Val av álitismonnum og nevndum. | 11-Feb | form. | | | | | | | | |
| 77 | Løgtingslóg um avskriving av restskuld av lánum, sum Húsalánsgrunnurin hevur úr oljugrunninum. | 14-Jan | FL | 21-Jan | liggjarnevnd | 18-Mar | 18-Mar | 22-Mar | 25-0 | 5-Apr. | 59,26-Mar. 93 |
| 78 | Broyting í løgtingslóg nr 32 um minstuløn, dagstuðning og minstaforvinning frá 27 mars 1992 við broyting í løgtingslóg nr 159 frá | 14-Jan | Fl | 21-Jan | fiskivinnunevnd | 26-Jan | 11-Feb | 23-Feb | 17-0 | 30-Mar. | 44,23-Mar. 93 |

| | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 16. november 1992. | | | | | | | | | | | |
| 79 | Handilssáttmálar við Finland, Ísland Noreg og Svariki | 14-Jan | FI | 4-Feb | marknaðarnevnd | 19-Apr | 21-Apr | | 18-0 | 29-Apr. | | |
| 80 | Yvirtaka av ráevnunum í undirgrundini | 14-Jan | FL | 29-Jan | marknaðarnevnd | 30-Apr | 4-Mei | | 21-0 | 24-Mai | | |
| 81 | Løgtingslóg um stuðul til feskfiska flotan. | 15-Jan | FL | 21-Jan | fiskivinnunevnd | 29-Jan | 16/2 23/2 | 26-Feb | 17-0 | 5-Mar. | 34,4-Mar. 93 | |
| 82 | Útskriving av nývali | 18-Jan | sambandsfl | 21-Jan | | | 26-Jan | | 13-4-8-7 | 10-Febr | | |
| 83 | Forðing fyri at ognarskattur til pensiónistar og aðrar borgarar verður settur í verk her á landi. | 20-Jan | T. Niclasen | 29-Jan | alm. og heilsun. | 18-Mar | 23-Mar | | 9-0 | 30-Mar | | |
| 84 | Ongar broytingar sum minka um fólkapensiónina | 20-Jan | KFFFF | 29-Jan | alm. og heilsun. | 18-Mar | 23-Mar | | 9-0 | 30-Mar. | | |
| 85 | Løgtingslóg um ásetan av likningarprosentingum fyri kommunu- og kirkju skatt og barnafrádrátt fyri 1993. | 20-Jan | FL | 21-Jan | | | 26-Jan | 26-Jan | 21-0 | 10-Feb | 24,2-Feb.93 | |
| 86 | Útróðrarmenn og arbeiðsloysistrygd | 21-Jan | KFFFF | 1-Feb | arb.málanevnd | 10-Mei | 11-Mei | | 28-0 | 27-Mai | | |
| 87 | Ilagustuðul og figging til alivinnuna | 26-Jan | KFFFF | 1-Feb | idnaðarnevnd | 11-Mei | 12-Mei | | 2-0 | 27-Mai | | |
| 88 | Norðurlendskur sáttmáli um útbúgvingarfelagsskap innan gymnasialar útbúgvingar. | 29-Jan | FL | 10-Feb | ment. og skúlan. | 15-Apr | 21-Apr | | 25-0 | 29 Apr | | |
| 89 | Broyting í løgtingslóg um trygging | 29-Jan | FL | 10-Feb | rættarnevnd | 26-Mar | 31-Mar | 15-Apr | 15-0 | 23-Apr | | |
| 90 | Løgtingslóg um uppboðssølu av fiski | 29-Jan | FL | 3-Feb | fiskivinnunevnd | 4-Feb | 9-Feb | 11-Feb | 27-0 | 5-Apr | 29,23-Feb. 93 | |
| 91 | Løgtingslóg um Strandferðslu landsins. | 29-Jan | FL | 3-Feb | samferðslunevnd | 26-Mar | 1/4-14/5 | | §1 8-0 | 27-Apr | | |
| 92 | Broyting í løgtingslóg um fólka- og farmaflutning. | 29-Jan | FL | 3-Feb | samferðslunevnd | 26-Mar. | 31-Mar | 15-Apr | 20-0 | 24-Mai | 90,6-Mai 93 | |
| 93 | Løgtingslóg um lántøku til landskassa | 4-Feb | FL | 5-Feb | figgjarnevnd | 9-Feb | 9-Feb | 9-Feb | 20-0 | 16-Febr | 28,11-Feb 93 | |
| 94 | Arbeiði til teirra, sum fáa arbeiðsloysisstuðul | 9-Feb | KFFFF | 16-Feb | arb.málanevnd | 10-Mei | 11-Mei | | 7 0 | 27-Mai | | |
| 95 | Stuðulstiltak til avreiðing og virkan råvøru her á landi. | 11-Feb | T. Niclasen | 23-Feb | fiskivinnunevnd | 16-Mar | 23-Mar | | 1-0 | 30-Mar | | |
| 96 | Loyvi til veiðu við húki á friðaðu | 11-Feb | KFFFF | 16-Feb | fiskivinnunevnd | 16-Mar | 23-Mar | | 2-0 | 30-Mar | | |

| | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | økjunum norðanfyri og vestanfyri. | | | | | | | | | | | |
| 97 | Arbeiðsskapandi tiltøk í sambandi við umvælingar av sethúsum. | 16-Feb | tjóðveldisfl | 18-Feb | arb.málanevnd | 10-Mei | 11-Mei | | 22-0 | 24-Mai | | |
| 98 | Broyting í løgtingslóg um almenn kunngerðarbtað | 16-Feb | tjóðveldisfl | 18-Feb | rættarnevnd | 11-Mei | 12-Mei | | 16-0 | 27-Mai | | |
| 99 | Skatting av hjúnum við helvtarbýti | 16-Feb | KFFFF | 16-Mar | skattanevnd | 13-Mei | 14-Mei | | 18-0 | 27-Mai | | |
| 101 | Umleggingarstuðningur til føskliska flotan í samband við nýggjar veiðumøguleikar. | 16-Feb | KFFFF | 26-Feb | fiskivinnunevnd<br>fíggjarnevnd | 31-Mar | 14-Apr | | 1-0 | 29-Apr | | |
| 102 | Løgtingslóg um ábyrgd fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m. á goymslu. | 23-Feb | FL | 26-Feb | fíggjarnevnd | 31-Mar | 15-Apr | 30-Apr | 23-0 | 24-Mai | 88,6-Mai | 93 |
| 103 | Ígildissetan fyri Føroyar av "Varemærkelov" og í "Fællesmærkelov" | 23-Feb | FL | 26-Feb | rættarnevnd | 23-Mar | 31-Mar | | 22-0 | 5-Apr. | | |
| 104 | Løgtingslóg um lántøku til landskass | 23-Feb | FL | 9-Mar | fíggjartenvnd | 14-Apr | 21/4-30/4 | 4-Mei | 18-0 | 24-Mai | 92,11-Mai | 93 |
| 105 | Broyting í løgtingslóg um arbeiðara vernd. | | FL | 16-Mar | arbeiðaravernd | 30-Apr. | 11-Mai | 13-Mei | 22,-1 | 27-Mai | 126,21-Mai | 93 |
| 106 | Skipan millum Føroyar og Ísland um sínamillum fiskirættindi í 1993. | 23-Feb | FL | 10-Mar | marknaðarnevnd | 31-Mar | 15 Apr | | 26-0 | 29-Apr. | | |
| 107 | M/f "Ternan" til privat og vella kom nalt felag lð tær loyvi til farma- og ferðafólkatiltoning millum Klaksvík og meginøkið (Leirvíks-Fuglafjørð) | 26-Feb | KFFFF | 16-Mar | samferðslunevnd | 21-Apr | 30-Apr | | 5-0 | 27-Mai | | |
| 108 | Forboð mót handli v.m. við Serbia og Montenegro ("Sambandtjóðveldið Jugoslavia"). | 9-Mar | FL | 10-Mar | | | 16-Mar | 22-Mar | 25-0 | 29-Apr. | 60 28-Mar. | 93 |
| 109 | Havbit og loyvi til veiðu við garnum eftir laksi á firðum og sundum við bátum undir 20 br.reg. tons í aug. og sept. | 9-Mar | KFFFF | 18-Mar | fiskivinnunevnd | 6-Mei | 10-Mei | | 9-0 | 27-Mai | | |
| 110 | Fyriskipan um ávísum tiltak móti Serbia og Montenegro ("Sambandstjóðveldið Jugoslavia)". | 9-Mar | FL | 10-Mar | | | 16-Mar | | 26-0 | 30-Mar. | | |
| 111 | Avtøka av punktgjaldi fyri "spariperur" (lágorkuperur) | 9 Mar | KFFFF | 31-Mar | skattanevnd | 14-Apr | 19-Apr | | 9-0 | 29-Apr | | |

| | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 112 | Avtøka av útvarps- og sjónvarps-monopolinum | 9 Mar | TN | 30-Mar | ment. og skúlan. | 30-Apr | 4-Mei | | 13-0 | 3-Jun. | |
| 113 | Frið at royna ettir hvítingi við linu. | 9-Mar | NPD | 18-Mar | tiskivinnunevnd | 14-Apr | 19-Apr | | 5-0 | 28-Apr. | |
| 114 | Ígildisseton fyri Føroyar av samarbeiðssáttmálanum fyri Norðurlandaráðið. | 16-Mar | FL | 23-Mar | | | 31-Mar | | 28-0 | 5-Apr | |
| 115 | Hækking av kostnaðinum á heilivági | 16-Mar | TN | 24-Mar | alm. og heilsun. | 11-Mei | 12-Mei | | 12-0 | 3-Jun | |
| 116 | Viðvíkjandi broytingum í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya í sermálum | 16-Mar | TN | 25-Mar | rættarnevnd | 6-Mei | alturtikið av Uppskot-stillaranum | | | 3-Jun | |
| 117 | Menning av jarðarbrúkinum. | 16-Mar | TN | 1-Apr | landbúnaðarnevnd | 14-Mai | 14-Mei | | 7-0<br>7-0 | 3-Jun | |
| 118 | Heilivágur til ativinnuná. | 16-Mar | TN | 31-Mar | Idnaðarnevnd | 13-Mei | 14-Mei | | 21-0 | 7-Jun. | |
| 119 | Veiðiloyvir bert at galda bókaveiðu | 16-Mar | TN | 30-Mar | fiskivinnunevnd | 15-Apr | 4-Mei | | 2-0 | 3-Jun. | |
| 120 | Verjureglur viðvíkjandi innflutning av breyðvørum. | 16-Mar | TN | 24 Mar | skattanevnd | 14-Apr | 19-Apr | | 11-0 | 29-Apr. | |
| 121 | Broytingar í løgini um meirvirðisgjald. | 22-Mar | TN | 24-Mar | skattanevnd | 14-Apr | 19-Apr | | 5-0 | 29-Apr. | |
| 122 | Góðsku- og vrakieftirlit fyri saltfis | 16-Mar | KFFFF | 18-Mar | Idnaðarnevnd | 11-Mei | 12-13-Mai | | 12-0 | 28-Mai | |
| 123 | Broyting í løgtingslóg um skatt av vinningi í samband við sølu av virðisbrøvum. | 16-Mar | FL | 24-Mar | skattanevnd | 6-Mei | 10-Mei | 11-Mei | 19-1. | 28-Mai | 104, 21-Mai 93 |
| 124 | Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt | 16-Mar | FL | 24-Mar | skattanevnd | 6-Mei | 10 Mei | 11 Mei | 17 4 | 28-Mai | 100,21-Mai 93 |
| 125 | Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt | 16-Mar | FL | 24-Mar | skattanevnd | 12-Mei | 13-Mei | | 4-0 25-3 | 28-Mai | |
| 126 | Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan | 16-Mar | FL | 24-Mar | skattanevnd | 12-Mei | 13-Mei | 14-Mei | 17-0 | 28-Mai | 109,21-Mai 93 |
| 127 | Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald. | 16-Mar | FL | 24-Mar | skattanevnd | 12-Mei | 14-Mei | 14-Mei | 24-0 | 20-Aug. | 101-102-103 21- Mai 93 |
| 128 | Yvirtøka av Færøernes Realkreditinstitut | 16-Mar | FL | 23-Mar | rættarnevnd | 13-Mai | 14-Mei | | 25-0 | 24-Mai | |
| 129 | Skipan millum Føroyar og Litavia um sínamillum fiskirættindi í 1993 | 16-Mar | FL | 25-Mar | marknaðarnevnd | 19-Apr | 21-Apr | | 25-0 | 29-Apr | |

| | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 130 | Søla av fastogn landsstýrisins í Tórshavn | 16-Mar | FL | 23-Mar | figgjarnevnd | 31-Mar | 14-Apr | 30-Apr | 24-0 | 24-Apr. | 86,6- Mai 93 |
| 131 | Løgtingslóg um javnstaðu millum kvinnur og menn. | 16-Mar | FL | 31-Mar | rættarnevnd | 13-Mei | 15-Me | | 18-0 | 24-Mai | |
| 132 | Sterkstreymslóggávan | 16-Mar | FL | 23-Mar | idnaðarnevnd | 11-Mei | 12-Mai | 14-Mei | 29-0 | 20-Aug | 134-142 10- Jun. 93 |
| 133 | Løgtingslóg um stuðul til útróðrarfiótan | 16-Mar | FL | 18-Mar | fiskivinnunevnd | 6-Mei | 10-Mei | 11-Mei | 27-0 | 20-Aug. | 140,25- Mai 93 |
| 134 | Broyting í løgtingslóg um eydnuspæl | 16-Mar. | FL | 25-Mar | figgjarnevnd | 31-Mei | 14-Apr | 30-Apr | 24-0 | 24-Mei | 91,6-Mai 93 |
| 135 | Løgtingslóg um gjald o.l. fyri innkrevjing av talnari skuld til landskassan | 16-Mar. | FL | 24-Mar | skattanevnd | 14-Apr | 21-Apr | 4-Mei | 19-0 | 24-Mei | 93,11-Mai 93 |
| 136 | Bekendtgørelse af overenskomst af 2 marts 1990 med Finland, Island, Norge og Sverige om oprettele af Det Nordiske Miljøfinansieringsselskab. | 16-Mar. | FL | 29-Mar | | | 1-Apr | | 26-0 | 5-Apr | |
| 137 | Søla burtur av fastogn landsstýrisins í Tórshavn | 16 Mar. | FL | 23-Mar | figgjarnevnd | 31-Mar | 14-Apr | 30-Apr | 24-0 | 24-Mei | 87,6-Mai 93 |
| 138 | Løgtingslóg um sølu av einum parti av fastogn hjá Klaksvíkar sjúkrahúsi | 16-Mar. | FL | 23-Mar. | figgjarnevnd | 31-Mar. | 21-Apr. | | 16-0 | 29-Apr. | |
| 139 | Strikking av skuld hjá Interkommuna. Renovationsfelagnum | 16-Mar. | FL | 23-Mar | figgjarnevnd | 31-Mar | 14-Apr | 30-Apr | 21-0 | 24-Mei | 89,6-Mai 93 |
| 140 | Løgtingslóg um bøgri handilsúrbúgving | 16-Mar. | FL | 29-Mar | mont. og skúlan | 12-Mei | 14-Mei | 14-Mei | 19-0 | 28-Mai | 127,21-Mai 93 |
| 141 | Løgtingslóg um útreiðslur til sjúkrakassarnar til heilivág og afturbering til landskassan | 16-Mar. | FL | 26-Mar | alm. og heilsun. | 11-Mei | 12-Mei | 13-Mei | 27-0 | 28-Mei | 115,21-Mai 93 |
| 142 | Løgtingslóg um ilat til øl, mineral vatn og lidnar leskidrykkir. | 16-Mar. | FL | 29-Mar | umhvørvisn. | | | | | 28-Mei | |
| 143 | Broyting í løgtingslóg um fiskiveiðu á landieiðini | 16-Mar. | sjóðveldisl | 18-Mar | idnaðarnevnd | | | | | | |
| 144 | Samráðingar við ríkisstjórnina | 16-Mar. | sjóðveldisl | 26-Mar | marknaðarnevnd | 11-Mei | 12-Mei | | 17-4. | 24-Apr. | |
| 145 | Samráðingar við EF um broytir fyri fiskaskapi. | 16-Mar. | sambandsfl | 25 Mar | marknaðarnevnd | 11-Mei | 12-Mei | | 4-0, 11-0 | 28-Mei | |
| 146 | Viðgerð av grannskoðaðum roknskapi | 16-Mar. | sjálvst.fl. | 25-Mar | rættarnevnd | 11-Mei | 12-Mei | | 9-0 | 28-Mai | |

| | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 147 | Viðgerð av almannaverkinum | 16-Mar. | sjálvst.fl. | 31-Mar | alm. og heilsun. | 19-Apr | 21-Apr | | 4-0 | 29-Apr | | |
| 148 | Broytingar í konkurslógini at forða spekulatión í gjaldsteðgi og húsagangi | 16-Mar. | KFFFF | 30-Mar | rættarnevnd | 11-Mei | 12-Mei | | 4-0 | 28-Mei | | |
| 149 | Fýra trolfrí øki á landleiðini | 24-Mar | fjóðveldisfl | 14-Apr | fiskivinnunevnd | 6-Mei | 11-Mei | | 23-0, 3-0 | 24-Mei | | |
| 150 | Gransking í viðgerðháttum og marknaðarføring av svartkjalti, síld, makreli o.ø | 16-Mar. | sambandsfl | 31-Mar | idnaðarnevnd | 11-Mei | 12-Mei | | 24-0 | 24-Mei | | |
| 151 | Uppskot til samtyktar viðvíkjandi marknaðarviðurskiftum | 18-Mar | sjálvstýris | 26-Mar | aftur tikið av uppskotsm. | | | | | 30-Mar | | |
| 152 | Løglingslóg um avtøku av løglingslóg um vinningsskeðg | 16-Mar | FL | 18-Mar | idnaðarnevnd | 11-Mei | 12-Mei | 13-Mei | 27-0 | 20-Mei | 110,21-Mai 93 | |
| 153 | Ígildissetan í Føroyum av lógarkunngerð "om banker og sparekasser" | 18-Mar | FL | 22-Mar | rættarnevnd | 14-Apr | 15-Apr | | 18-4 | 16-Apr | | |
| 154 | Ígildissetan í Føroyum av lógarkunngerð um "erhvervsdrivende fonde" | 16-Mar. | FL | 22-Mar | rættarnevnd | 14-Apr | 15-Apr | | 18-4 | 16-Apr | | |
| 155 | Ígildissetan í Føroyum av lógarkunngerð "om visse kreditinstitutter" | 18-Mar | FL | 22-Mar | rættarnevnd | 14-Apr | 15-Apr | | 18-4. | 16-Apr | | |
| 156 | Ígildissetan í Føroyum av lógarkunngerð "om aktieselskab" | 18-Mar | FL | 22-Mar | rættarnevnd | 14-Apr | 15-Apr | | 18-5 | 16-Apr | | |
| 157 | Ígildissetan í Føroyum av lógarkunngerð "om anpartsselskaber" | 18-Mar | FL | 22-Mar | rættarnevnd | 14-Apr | 15-Apr | | 18-4 | 16-Apr | | |
| 158 | Ígildissetan í Føroyum av lógarkunngerð "om visse selskabers aflæggelse af årsregnskab m.v. | 23 Mar | FL | 29-Mar | rættarnevnd | 14 Apr | 15-Apr | | 18-4 | 16-Apr | | |
| 159 | Avtøka av løglingslóg um eftirgevin av ella gjaldsskipan fyri skuld til landskassan | 18-Mar. | FL | 25-Mar | figgjarnevnd | 31/3 13/5 | 21/4-14/5 | | 17-3 | 28-Mei | 110,21-Mai 93 | |
| 160 | Dómarakanning av politisku og umsitingarligu ábyrgdini síðani 1975 | 18-Mar. | KFFFF | 1-Apr | rættarnevnd | 11-Mei | 13-Mai | | 11-0 | 7 Jun | | |
| 161 | Løglingslóg um fiskavraking | 23 Mar | V.Johannessen. | 30-Mar | idnaðarnevnd | 11-Mei | 12-Mai | | 15-0 | 28-Mei | | |
| 162 | Løglingslóg um landsins almenna roknskaparhald v.m | 24-Mar | FL | 29-Mar | figgjarnevnd | 6-Mei | 10-Mai | | 29-0 | | | |
| 163 | Løglingslóg um løggildar grannskoðarar | 23-Mar. | FL | 29-Mar | rættarnevnd | 6-Mei | 10-Mai | | 24-0 | 28-Mei | 120,21-Mai 93 | |

| | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 164 | Løgtingslóg um skúsettar grannskoðarar | 23-Mar | FL | 29-Mar | kultarnevnd | 6-Mei | 10-Mei | | 24-0 | 28-Mei | 119 21-Mar | 93 |
| 165 | Broyting í løgtingslóg um lærlingaviðurskifti | 23-Mar | FL | 1-Apr | ment. og skúlan. | 30-Apr | 4-Mei | | 19-0 | 28-Mei | 122,21-Mai | 93 |
| 166 | Broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan | 23-Mar | FL | 1-Apr | ment.og skúlan. | 30-Apr | 4-Mei | 6-Mei | 20-0 | 28-Mei | 121,21-Mar | 93 |
| 167 | Ilagustuðul til alivinnuna | 25-Mar | FL | 26-Mar | tiggjarnevnd | 31-Mar | 1-Apr | 1-Apr | 21-0 | 29-Apr | 72 2-Apr. | 93 |
| 168 | Ígildissetan í Føroyum av "lov om støtte til danske investeringer i østlandene" | 26-Mar | FL | 31-Mar | | | 15-Apr | | 22-0 | 29-Apr | | |
| 169 | Broyting í lerðslulógini | 30-Mar | FL | 1-Apr | rættarnevnd | 11-Mei | 12-Mei | | 13-0 | 28-Mei | | |
| 170 | Broyting í løgtingslóg um evnisskrá hjá almennum myndugleikum | 30-Mar. | FL | 1-Apr | rættarnevnd | 1-Apr | 2-Apr | | 19-0 | 29-Apr | 72 2-Apr. | 93 |
| 171 | Broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðarøktarlærargrunn | 30-Mar. | FL | 1-Apr | arb.marianevnd | 1-Apr | 2-Apr | 2-Apr | 22-0 | 29-Apr | 68 2-Apr. | 93 |
| 172 | Broyting í løgtingslóg um frítíð við løn. | 30-Mar. | FL | 1-Apr | arb.máianevnd | 1-Apr | 2-Apr | 2-Apr | 24-0 | 29-Apr | 71 2-Apr. | 93 |
| 173 | Broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávising | 30 Mar | FL | 1-Apr | arb máianevnd | 1-Apr | 2-Apr | 2-Apr | 23-0 | 29-Apr | 69,2- Apr. | 93 |
| 174 | Grannskoðan av almennum roknskapu løgtingslóg um løgtingsgrannskoðaran | 19-Apr | løg.formans | 19-Apr | tiggjarnevnd | 6-Mei | 10-Mei | | 29 0 | | | |
| 175 | Grannskoðan av almennum roknskapu løgtingslóg um grannskoðan av landsins almennu roknskapum v.m. | 19-Apr | løg.formans | 19-Apr | tiggjarnevnd | 6 Mei | 10 Mei | | 29-0 | | | |
| 176 | Grannskoðan av almennum roknskapu reglugerð um val og virki løgtingsgrannskoðaranna | 19-Apr | løg.formans | 19-Apr | tiggjarevnd | 6-Mei | 10-Mei | | 29-0 | | | |
| 177 | Stuðul til bygging av fiskiførum á føroyskum skipasmiðjum til útflutnings | 14-Apr. | FL | 21-Apr. | | | 30-Apr | 4-Mei | 25-0 | 24-Mei | 96,11-Mai | 93 |
| 178 | Stuðul til bygging av farmaskipum | 14-Apr. | FL | 21-Apr | | | 30-Apr | 4-Mei | 27-0 | 24-Mei | 94,11-Mai | 93 |
| 179 | Løgtingslóg um hægri tøkniliga úfbúgving | 15-Apr | FL | 21-Apr | ment. og skúlan | 12-Mei | 14-Mei | 14-Mei | 22-0 | 26-Mei | 129,21-Mai | 93 |
| 180 | Løgtingslóg um tøkniligar yrkis- | 15-Apr | FL | 21-Apr | ment og skúlan | 12-Me | 13-Mei | 14-Mei | 20-2 | 27-Mei | 126,21-Mai | 93 |

| | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | úthúgvingar | | | | | | | | | | | |
| 181 | "Lov um tilskud til Færøernes Hjemmestyre" | 6-Mei | FL | 10-Mei | llggjarnevnd | 13-Mei | 14-Mei | | 22-8 | 24-Mei | | |
| 182 | Broyting í løgtingslóg um evnisskrá hjá almennum myndugleikum | 6-Mei | FL | 10-Mei | rættarnevnd | 11-Mei | 12 Mei | 13-Mei | 18-0 | 28-Mei | 124.21-Mai | 93 |
| 183 | Fyrisitingarlóg (92/91) | | | 10-Mei | rættarnevnd | 6-Mei | 10-Mei | 11-Mei | 23-0 | 20-Aug | 132,10-Jun | 93 |
| 184 | Lóg um innlit í fyrisitingina (93/91) | | Rættarn. | | rættarnevnd | 6-Mei | 10-Me. | 11-Mei | 24-0 | 20-Aug | 133,10-Jun | 93 |
| 185 | Tiltak at hjálpa teimum, ið sita við ovurhøgum setthúsa- og íbúðar lánum | 6-Mei | fólkafl. | 11-Mei | llggjarnevnd | 13-Mei | 14 Me | | 10-0 | 26-Me | | |
| 186 | Broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing | 6-Mei | FL | 10 Mei | atm og neitsun | 12-Mei | 13-Mei | 14-Mei | 18-1 | 28-Mei | 108.21-Mai | 93 |
| 187 | Uppskot um hoskandi sjúkraflútning tænastu til Vágar, Sandoyar, og Nólsoy | 6-Mei | Sv.E. /J. P | 11-Mei | samferðslunevnd | 13-Mei | 14 Mei | | 26-0 | 24 Mei | | |
| 188 | Broyting í løgtingslóg um ferðaavgjald. | 6-Mei | FL | 10-Mei | riggjarnevnd | 13-Mei | 14-Mei | 14-Mei | 17-8 | 27-Mei | 111,21 Mai | 93 |
| 189 | Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan | 6-Mei | FL | 10-Mei | skattanevnd | 12-Mei | 13-Mei | 14-Mei | 25 0 | 27-Mei | 107,21-Mai | 93 |
| 190 | Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald. | 6-Mei | FL | 10-Mei | skattanevnd | 12 Mei | 13-Mei | 14-Mei | 19-0 | 28-Mei | 105,21 Mai | 93 |
| 191 | Broyting í løgtingslóg um bundna uppsparing | 6-Mei | FL | 10-Mei | llggjarnevnd | 13-Mei | 14-Mei | 14-Mei | 20-0 | 26-Mei | 113,21 Mai | 93 |
| 192 | Setan av nevnd til at koma við uppskotum um, hvussu búskapurin í landinum kann byggjast uppaftur | 6-Mei | fólkaflokk | 12-Mei | llggjarnevnd | 12-Me. | 14-Mei | 14-Mei | 8-0 | 28 Mei | | |
| 193 | Broytingar í útvarpsgjaldsskipanini | 6-Mei | TN | 10-Mei | llggjarnevnd | 12-Mei | 13-Mei | | 24-0 | 24-Mei | | |
| 194 | Lækkan av útvarps- og sjónvarpsgjaldinum | 6-Mei | løgtingsgr | 11-Mei | llggjarnevnd | 12-Mei | 13-Mei | | 26-0 | 24-Mei | | |
| 195 | Broyting í løgtingslóg um veðhald fyri lánum til trysti og flakavirkir | 6-Mei | FL | 11-Mei | llggjarnevnd | 12-Mei | 13/5-14/5 | 14 Mei | 17-0 | 28-Mei | 114,21-Mai | 93 |
| 196 | Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt | 6-Mei | FL | 10-Mei | skattanevnd | 13-Mei | 14-Mei | 14-Mei | 24-0 | 27-Mei | 112,21-Mai | 93 |
| 197 | Løgtingsins umboðsmaður (142/91) | | | | rættarnevnd | 12 Ma | 14-Mei | 14-Mei | 19-0 | 24-Mei | | |

| | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 198 | Løgtingslóg um býti av almanna - útreiðslunum v.m. | 6-Mei | FL | 10-Mei | ián. og heilsun | 12-Mei | 13-Mei | 14-Mei | 29-0 | 28 Mai | 125,21 Mai 93 |
| 199 | Arbeiðsskaparáti tiltøk (138/91) | | | | arb málanevnd | 12-Me | 13-Mei | | 21-0 | 24-Mai | |
| 200 | Vegir og ferðingar | | | | samferðslunevnd | 13-Me | 14-Mei | | 20-0<br>19-0 | 19-Mei | |
| 201 | Løgtingslóg um fuglaveiðu (140/91) | | | | hskivinnunevnd | 14-Me | 14-Mei | | 17-0 | 24 Mei | |
| 202 | Broyting í løgtingslóg um arvagjald | | | ikki fram-lagt | | | | | | | |
| 203 | Broyting í løgtingslóg um rentuskatt | 19 Mei | FL | 19-Mei | skattanevnd | 19-Mei | 19-Mei | 19-Mei | 17 0 | 28 Mai | 106 21 Mai93 |
| | EYKATING 1992 | | | | | | | | | | |
| 204 | Lántøka til landskassan | 9-Jun | FL | 11-Jun | tlggjarnevnd | 14-Jun | 14-Jun | 14-Jun | 28-0 | 15-Jun. | 137,16-Mar.93 |
| 205 | Endurstovnan av eginpeningi Menningargrunsins Íðnaðarins | 9-Jun | FL | 11-Jun | tlggjarnevnd | 14-Jun | 14-Jun | 14-Jun | 28-0 | 20-Aug. | 138,16-Mar.93 |
| 206 | Ettirgeving av skuld og endurstovnan av eginpeningi Føroya Íðnaðargrunsins | 9-Jun | FL | 11-Jun | tlggjarnevnd | 14-Jun | 14-Jun | 14-Jun | 28-0 | 20-Aug | 139,16-Mar.93 |
| 207 | Rammuavtala frá 28. mai 1993 um endurfígging av skuld landskassans o.a. | 9-Jun | FL | 11-Jun | tiggjarnevnd | 14-Jun | 14-Jun. | 14-Jun | 21-6 | 15-Jun | |

| | | | Frá | frábeðaður | | atkvøður | svaraður | avgreitt |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 100-1 | Jóannes Eidesgaard | Uppsagnum av fólki í almennum starvi | H.Nielsen | 25-Aug | 31-Aug | 20-0 | 14-Des | 5-Jan. 93 |
| 100-2 | Jógvan Sundstein | Gjald av skuld til Tvøroyar býráð fyri leigu av hølum til HF. | T. Niclasen | 20-Aug | 25-Feb | 20-0 | 31-Aug | 3-Sept. 92 |
| 100-3 | Jóannes Eidesgaard | Umsitingin á Landssjúkrahúsinum. | B.Danielsen, E. Arge og B Djurholm | 25-Aug | 31-Aug | 22-0 | 31-Aug | 3-Sept. 92 |
| 100-4 | Jóannes Eidesgaard | Sjúkraflutningur millum Nólsoy og høvuðsstaðin | B. Djurholm | 25-Aug | 31-Aug | 24-0 | 29-Sep | 16-Nov 92 |
| 100-5 | Jóannes Eidesgaard | Ætlan landsstýrisins við Klaksvíkar og Suðuroyar sjúkrahúsi | N.P. Danielsen | 25-Aug | 31-Aug | 15-0 | | |
| 100-6 | Marita Petersen | Viðvikjandi loyvi til nærvarp í Føroyum. | T. Niclasen | 28-Sept | 29-Sep | 17-0 | 27-Okt | 16-Nov. 92 |
| 100-7 | Jógvan Sundstein | Nýtslan av P-talinum í samskiftinum millum Toll-og Skattavaldinum | T Niclasen | 13-Okt | 27-Okt | 20-0 | 27-Okt | 16-Nov. 92 |
| 100-8 | Jóannes Eidesgaard | Hvussu lang: landsstýrið er komið í kanning um trygging av lánum í sethúsum. | H. Nielsen | 22-Okt. | 27-Okt | 21-0 | 14-Des | 5-Jan. 93 |
| 100-9 | Jógvan Sundstein | Viðvikjandi arbeiðsuppgávum hjá kommunalum stovnum | í. Klein | 30-Okt. | 4-Nov | 20-0 | 24-Nov | 2-Des 92 |
| 100-10 | Marita Petersen | Góðkenning av undirvísingartilfari í fólkaskúlanum | N.P Danielsen | 30-Okt | 4-Nov | 17-0 | 22-Des | 5-Jan. 93 |
| 100-11 | John Petersen | Veiðu eftir jakupskel og kanningar av havbotninum | N P Danielsen | 4-Nov | 6 Nov | 21-0 | 11-Des | 5-Jan. 93 |
| 100-12 | Jógvan Sundstein | Trongsteðu kommununna. | T. Niclasen | 6-Nov. | 7-Nov | 25/0 | 14-Des | 5-Jan 93 |
| 100-13 | Jóannes Eidesgaard | Telefon og skriustovulið hjá Almannastovuni og Arbeiðsloysistryggingini. | N P Danielsen | 13-Nov | 17-Nov | 24-0 | 22-Des | 5-Jan. 93 |
| 100-14 | John Petersen | At uppkeypa skip við upphoggingarstuðli úr einni sýslu í aðra. | H.O. Hoirosen | 13-Nov | 17-Nov | 22-0 | 14-Jan | 25-Jan. 93 |
| 100-15 | Svend Aage Ellefsen | Viðvikjandi sigling hjá Terstanum. | H.Nielsen, F. Mikkelsen,H. Old. S.Midjord og M Sørensen | 25-Nov. | 27-Nov | 20-0 | 10-Mar | 30-Mar. 93 |
| 100-16 | Jógvan Sundstein | Um bátafar (solvent) virki, tó verða | N P Danielsen | 25-Nov | 27-Nov | 24-0 | 14-Des | 5 Jan 93 |

| | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | Koyrd á húsagang | | | | | | | |
| 100-17 | Jógvan Sundstein | Um pengar til arbeiðsloysisgrunnin | N.P. Danielsen | 17-Des | 21-Des | 22-0 | 15-Jan | 25 Jan | 93 |
| 100-18 | Svend Aage Ellefsen | Ferðaloikkallutoning millum Skálafjarðin og Havnina. | D Petersen | 17-Des | 21-Des | 24-0 | 14-Jan | 25-Jan | 93 |
| 100-19 | Marita Petersen | Viðurskiftini innan almennu umsitingi i Føroyum | T. Niclasen | 16-Mar | 22-Mar | 18-0 | 26-Mar | 30-Mar | 93 |
| 100-20 | Jóannes Eidesgaard | Útreiðslur í samband við ættleiðing | T. Niclasen | 16-Mar. | 22-Mar | 18-0 | 19-Apr | 29-Apr. | 93 |
| 100-21 | Marita Petersen | Kósavirkið og Føroyagrunnurin frá 1973. | N.P Danielsen | 16 Mar | 22-Mar | 18-0 | 14-Mai | 27 Mai | 93 |

# Ólavsøkutingið 1992

Ár 1992, Ólavsøkudag kl. 13.00 varð løgtingið sett. Løgtingsformaðurin frá seinastu tingsetu, Anfinn Kallsberg, setti tingið sambært skriv dagfest 14. juli 1992.

Tingmenninir eru:

**Norðoya valdømi:**

Anfinn Kallsberg, Viðareiði, ff.,
Vilhelm Johannesen, Klaksvík, ff.,
Asbjørn Joensen, Klaksvík, sj.,
Heini O. Heinesen, Kunoy, kf.
Niels Pauli Danielsen, Klaksvík, krf&fff.,

**Eysturoyar valdømi:**

Jógvan I. Olsen, Toftir, sb.,
Edmund Joensen, Oyri, sb.,
Olaf Olsen, Glyvrar, ff.,
Jørgen Thomsen, Skála, jf.,
Lasse Klein, Saltangará, sj.,
Signar Hansen, Fuglafirði, tf.,
Tordur J. Niclasen, Eiði, krf. & fff.

**Norðstreymoyar valdømi:**

Terji Davidsen, Kollafjørður, Vestmanna, sb.,
Heini Johansen, Vestmanna, jf.

**Suðurstreymoyar valdømi:**

Óli Breckmann, Tórshavn, ff.,
Birgir Danielsen, Hoydølum, ff.,
Bjarni Djurholm, Hoyvík, ff.,
Lisbeth L. Petersen, Tórshavn, sb.,
Finnbogi Arge, Tórshavn, sb.,
Jóannes Dalsgaard, Tórshavn, jf.,
Jákup Lindenskov, Tórshavn, jf.,
Helena Dam á Neystabø, Tórshavn, sj..

Finnbogi Ísakson, Tórshavn, lf.,

**Vága valdømi:**

Jørgen Niclasen, Sørvági, ff.,
Frank Davidsen, Sørvági, jf.

**Sandoyar valdømi:**

Eyðun Viderø, Sandi, ff.,
Jógvan Adolf Johannessen, Skopun, jf.

**Suðuroyar valdømi:**

Flemming Mikkelsen, Vági, sb.,
Henrik Old, Vági, jf.,
Sverre Midjord, Tvøroyri, jf.,
Mikkjal Sørensen, Porkeri, jf.,
Hergeir Nielsen, Vági, lf.

Fyribils formaðurin bað Sverre Midjord og Frank Davidsen um at virka sum ávikavist 1. og 2. tingskrivari.

Síðani varð formansskapur valdur. Til tingformann varð valdur Anfinn Kallsberg, 1. næstformaður: Lisbeth L. Petersen, 2. næstformaður: Jógvan Adolf Johannessen og 3. Næstformaður: Frank Davidsen.

Sum 1. tingskrivari varð Sverre Midjord vald og sum 2. tingskrivari varð Flemming Mikkelsen valdur.

Formaðurin gav síðani Atla P. Dam, løgmanni, orðið til løgmansrøðuna á Ólavsøku 1989.

# Frágreiðing frá løgmanni 1992

Fleiri ferðir í hesi øldini - og serliga í triatiarunum og fimtiárunum - voru búskaparkreppur um allan heim við herjandi arbeiðsloysi og vinnulivstrot.

Í sjeytiárunum kom aftur olag á heimsbúskapin, og eru trupulleikarnir bara øktir øll attati- og nitiárini, soleiðis at nú eru meira enn hálvthundrað milliónir menniskju arbeiðsleys bara í Europa. Í USA er ikki mætari fyri ikki at tala um triðja heimin, har nógvastaðni valdar beinleiðis neyð og hungur, m.a. tí at ongar sosialar skipanir eru, sum kundu bøtt um.

Onki land, heldur ikki stóru og riku iðnaðarlondini, er sloppið undan avleiðingunum av hesi seinastu kreppu, sum serliga gjørdi vart við seg hin dagin, tá ið virðisbrævamarknaðirnir um nærum allan heim fóru um koll. Eisini lond, sum vanliga hava megnað at skákað sær undan arbeiðsloysi - t.d. Svøriki og Ísland - hava í løtuni ilt við at fóta sær í hesum vandamali.

Tað er sagt fleiri ferðir fyrr, at búskapargongdin í Føroyum stóran part av hesari tiðini hevur verið øvugt henni uttan um okkum - serliga í seksti-, sjeyti- og áttatiárunum; men í løtuni hava vit so nakrar av hesum somu trupulleikum at dragast vit, og draga teir vaksandi arbeiðsloysi í kjalarvørri.

## Búskaparviðurskifti

Álvarsamasti trupulleiki okkara er lítla ravørutilfeingið, og tað kenst serliga meint í løtuni, nú ið stovnarnir undir Føroyum eru serliga veikir. Hetta bøtist bara við frægari gagnnytslu og virðisøking og at sýna hugflog til at finna aðrar vinnuvegir.

Ein bati - fyribils - er at keypa fisk til virkingar í Føroyum; men veruliga loysnin verður bara rokkin, um vit megna at loysa úr hafti tað meirvirðið, ið er innilæst í okkara dygdarrávøru, bæði feskari óviðgjørdari og viðgjørdari til hægri virðisstig,

tá ið hon beinleiðis rakkur sjálvum brukaranum.

Tað, at vit vita, at okkara tænastuveitingar gevur størri virði, er ein fortreyt, vit hava fram um aðrar. Tá eru í slíkum búskapartrupulleikum og vit.

Stóra nettoskuldin til útlond er annar høvuðstrupulleiki, sum vit kortini nú virka okkum burturúr. Gjaldsjavnaavlopið í 1991 gjørdist heilar 414 mió. kr. og merkir hetta, at skuldin minkaði. Tó ikki sama tal - ti kurstap er staðfest - men samanlagt minkaði skuldin 325 mió. kr. til 8.192 mió. kr. Fyrstu ferð í 20 ár hava vit niðurgoldið skuld okkara.

Gongdin higartil í ár talar fyri einum gjaldsjavnaavlopi eisini í ár, hóast neyvan so stórum sum í 1991, ti útflutningurin er lækari og innflutningurin størri - ið hvussu so er í tølum, nú skrásetingin er neyvari. Tollinntøkurnar benda tó ikki á, at innflutningurin veruliga er farin at vaksa aftur.

Enn er ov tíðliga at meta um endalig út- og innflutningstøl í 1992 ella um niðurskrivingina í lánum uttanlands, hon er tengd at afturgjaldingarførleikanum hjá privatum vinnuvirkjum og at endurfiggingum við eigaraskifti í vinnuni; men niðurskrivingin av privatari skuld verður rættiliga stór í ár.

Almenna skuldin minkar ikki í ár, m.a. ti at enn verða nøkur veðhaldsútlegg at figgja við lántøku, og likviditetsstøðan sum heild - serliga tann hjá peningastovnunum - leggur tryst á hitt almenna um at útvega likviditet til samfelagsraksturin.

Vandin fyri, at privat skuld varð flutt í landskassan, var sera stórur við teim stuðuls-, veðhalds- og kredittstýringsskipanum, vit høvdu sjeyti- og áttatiárini. Almenna skuldin er ti vaksin úr 447 mió.kr. í 1987 uppí 2.187 mió.kr. í 1991.

Kunnu vit komandi árini minka skuldina munandi, fer hitt almenna kortini at kunna greiða eina nakað størri lánsbyrðu enn nú. Her

veldst to um, um malsetningur landsstyrisins at venda rakstrarhalli landskassans til avlop, verður rokkin. Hetta eydnaðist ikki í 1992. Fíggjarlógin fyri 1992 hevði 92 mió. kr. í halli; men higartil í ár hava inntøkur landskassans ikki staðið mat, og einstakar útreiðslur verðnar størri. Tiltøk til at halda hallinum forsvarliga vóru ti sett í verk í mai, tá ið nakrar útreiðsluskerjingar og inntøkulógir vóru samtyktar.

**Arbeiðsloysið**

Ov lítið ravørutilfeingi og skuld til útheimin kunnu gerast upp í tølum ella tøkniligum frágreiðingum, men avleiðingin fyri hin einstaka føroyingin og velferð hansara - ella tey okkara, sum meinast verða rakt - ikki kann verða fulllýst í tølum um nytslu, inntøku og útreiðslu ella møguleikar til at taka hjá tí einstaka.

Kortini er ongin ivi um, at hitt mest ørkymlandi vandamálið er tað sama sum hjá grannum okkara: **Ov stort arbeiðsloysi.**
Øll politisk og onnur tiltøk mugu tí minka um hetta og økja virksemið aftur, tó ikki avlaga búskapin so, at álitið uttanlands á, at vit megna at virka okkum burtur úr verandi støðu, fýkur.

Hetta er trupul malsetningur, tí tiltøk viðvíkjandi gjaldsjavna, landskassanalli, íløgum og virksemi oftast hvørt sær reynast á einum øki, men hava øvugta avirkan á hini. Tí kann málið um allan búskapin í javnvág ikki sleppast úr eygsjón eina løtu.

Minkaða virksemið á ymsum økjum er lýst í fylgiskjølunum og frágreiðing frá búskaparráðnum, men tiltøkini øki fyri øki verða fráboðað í hesi frágreiðing mini.

Eitt hitt týdningarmesta í strembanini at útvega flestum hondum arbeiði er, at hugsjónin um at fleiri herðar mugu bera, tí teir bera betri og meiri enn færri, ikki verður slept, ella við øðrum orðum, at soliduriteturin, sum er ibygdur øllum velferðarsamfeløgum, framvegis verður verandi.

Tíverri er tað enn ein minniluti av tøroyingum, sum ber meginpartin av byrðunum av trongru tíðunum. Hin stóri meirilutin hevur enn ikki merkt broytingarnar.

Sannleikin er, at tøku vit øll okkara part, kundu vit slept orðinum kreppa og heldur talað um eina minking í framlopi føroyinga. So sterkt er kortini hetta samfelag. Men sum er, kenst hinum arbeiðsleysa støðan nívandi og vonleys. Landsstýrið hevur tí roynt at fáa fleiri fakbolkar at tola eitt lítið nos beint nú, men undirtøkan er enn ivasom.

Vit verða framhaldandi í løggávu og á annan hátt at virka fyri, at byrðarnar gerast lættari, tí tær verða lagdar á fleiri herðar.

Arbeiðsloysið var vorðið munandi, tá ið henda samgongan tók við, og tað er munandi enn; men vit mugu av øllum alvi forða fyri, at tað gerst varandi og soleiðis eins og í fleiri londum gerst eitt búskaparpolitiskt stýringaramboð.

Løggávan um arbeiðsloysistrygging er eitt stig rætta vegin; men skatta- og avgjaldsløggávan kann gerast munin rættvisari og helst gøva størri ikast til samfelagsraksturin, tó at hin einstaki ikki kennir hetta tyngri.

Figgjarlógarkarmurin má innan alt ov druqva tíð rumkast nakað aftur, helst einar 2-300 mill.kr., og virksemið, sum verður rikið í honum, verð samskipað betur, munadyggari og biligari.

Nýggj tolllóg tók við 1. februar, og uppskot til lóg um meirvirðisgjald er lagt fyri tingið. Slík løggáva samsvarar avgjaldsskipanunum í øðrum londum, og hon víðkar samstundis skattagrundarlagið, og gevur helst inntøkur frá fleiri borgarum enn áður. Soleiðis verða møguleikar at broyta persónsskattaskipanina ávegis eini bruttoskattaskipan skaptir.

Rentuskattaskipanin er broytt frá ognarskatti til lágan skatt av rentuni. Eisini her er skattagrundarlagið víðkað.

fløgurnar í áttatiárunum hava fingið mangt skotið fyri bógvin, og rætt er, at tær voru einar 200 mio.kr. ov storar hvørt árið. Hetta vistu fíggjarfrøðingar og politikkarar alla tíðina á.

Men at føroyingurin ikki hevur havt storar fyrimunir av hesum, er alt annað enn rætt. Allir føroyingar hava notið gott av teim, m.a. ti vit sluppu undan ti arbeiðsloysi, sum herjaði aðrastaðni hesi ár. Arbeiðsloysið kom ikki til okkara fyrr enn 10-15 ár seinni enn a meginlandinum, og hóast fleiri skip aftur eru mist av landinum, eiga vit enn vinnutól, sum nógv betur enn fyrr seta okkum før fyri at troyta nýggjar møguleikar, tá ið slíkir møguleikar gerast tøkir.

Lítið hevði verið at gjørt í Barentshavinum, í Irmingerhavinum ella á neiit djúpum vatni í útsynning ur Føroyum, uttu vit ikki hesi valafor at farið við nu.

Valið ímillum 10 ár við arbeiðsloysi og einum niðurslitnum vinnutóli meira enn 10 ára gamalt og so støðuna nu vit kortini hava møguleika at basa arbeiðsloysinum aftur eftir 2-3 árum afturat, ti vit eiga vinnutól, eigur at verða havt í huga, aðrenn alt okkara samfelag, okkara politisku skipanir og okkara møguleikar verða lastað í sand og ósku. Tá valdu føroyingar støðuna, sum var í áttatiárunum, heldur enn 10 ára arbeiðsloysi. Rentur og avdrattir av almennum lánum eru kortini ikki hægri enn 300-350 mió. kr. árliga, og fevna eisini um øll íløgulán í áttatiárunum, har hitt almenna útbygdi munandi.

**Landsbankin**

Lógin um landsbankan er broytt, og viðtøkurnar eru eisini broyttar. Samstarvsavtala millum landsstýrið og landsbankan er gjørd. Veruliga virksemið landsbankans kann byrja nu. Umframt at virka sum lánsútvegari til landskassan - hetta hevur landsbankin gjørt seinastu 4 árini - fer hann at vera bankasamband landskassans og eisini at hava samskifti við privatu peningastovnarnar. Herumframt fer landsbankin at gera samfelagsligar gjaldførisknn-

ingar og ráðgeva og samskipa uttanlandslántøku hjá almennum myndugleikum og stovnum, íroknað kommunum.

**Fiskivinnan**

Eitt av stórmálunum landsstýrið hevur fyri sær, er at medvirka til at byggja upp aftur fiskastovnarnar undir Føroyum, so at støðuga úrtøkan verður 100-120.000 tons av virðismiklum botnfiski í staðin fyri tey uml. 80.000 tonsini, sum tykjast verða úrslitið í ár, mett eftir veiðutølunum fyrru helvt í ár.

Feskfiskaveiðan undir Føroyum hevur verið munandi minni enn í 1991. Minni fiskiskapur undir Føroyum og 3.000 tons minni í kvotu undir Íslandi merkja avreiðingarnar til føroysku virkini fyrstu 6 mánaðirnar í ár. Avreidd eru 37.500 tons ella 14.000 tons minni enn í 1991. Hetta svarar til 27% afturgongd í føroysku avreiðingunum. Fremmand skip hava avreitt 4.200 tons og nakað av frystum fiski er eisini keypt.

Húkaflotin og partrolararnir hava størstu afturgongdina. Harafturímóti hevur roynst frægari hjá djúpvatnstrolarunum.

Telefonuppboðssølan hevur roynst hampuliga væl hjá skipunum. Seld eru 15.200 tons fyri 125,6 mió. kr. ella 8,27 kr/kg. í miðal. Uppboðssølan fer helst at umsita 35-40% av øllum avreiðingum.

Hægstu prísirnir vóru í mars, tá ið fiskasølur avaraðu um, at teir vóru ov høgir, tvs. 9,13 kr./kg.; men hava síðani prislækkingar verið á marknaðinum, og innflutti fiskurin hevur minkað um hugin at bjóða á uppboðssøluni.

Einki er yvir at dylja at ein ávis mótstøða hevur verið at fáa uppboðssøluna at virka fritt. Serliga virki, sum hava skip knýtt at sær, hava mælt ímóti. Arbeitt verður við at skipa fyri veruligum uppboðssølum, har keyparin kann skoða fiskin á golvinum.

Hetta fer at økja um frælsu kappingina um fiskin og geva betri

møguleikar hjá keyparum at keypa júst tað slag, og tær nøgdir og støddir, sum tørvur er á. Meiri fæst burturur teimum fiskasløgum, sum koma í smærri nøgdum, og at møguleikarnir fyri servirkan til serligar marknaðir batna, og fleiri fáa møguleika at keypa.

Veiðuorkan

Lítil ivi er um, at veiðuorkan er rikiliga stór til 100-120.000 tons undir Føroyum. Færri fór høvdu borið seg betur, og stovnarnir vóru frægari vardir; men spurningurin um at minka flotan er ikki, og hevur ikki verið, einfaldur at loysa.

Skulu hesi mongu skip veiða alt arið undir Føroyum? Ella skulu vit við legudøgum, stongdum leiðum og øðrum tiltøkum trysta tey út av Føroyaleiðunum til tess at troyta møguleikarnar, har eru? Næstan 2.000 tons av upsa eru ófiskað í Norðsjónum og lítil reynd í dýpinum vestanfyri og als ongin eftir fiskasløgum, eitt nú fransar hava veitt (búrfiski, stingluksi, háví o.ø.).

Ringir spurningar at taka støðu til. Tí tað er torført at greina út, hvussu vánaliga støðan í toska-, hýsu- og øðrum stovnum, veiðutrýst og náttúrufyribrigdi eru samantengd.

Men hóast vit ikki vita, um orsøkin til minkandi veiðu er ovfisking ella bara gongdin í náttúruni, er niðurstøðan í báðum førum heist, at veiðufloti og virki eiga at vera stillað eftir einum rimiligum miðalúrsliti í longri tíð. Er náttúran kørg, eru eisini grundir at dryggja argangir av botnfiski.

Tiltøkini at fáa fiskastovnarnar aftur á føtur hava serliga snúð seg um friðingar í gýtingartíðini og legudagar. Roynt verður eisini at draga inn veiðuloyvi til iðnaðar- og botnfiskaveiðu, serliga hjá trolarum, har tað ber til at fáa teir í aðra vinnu.

Koma nyggir veiðumøguleikar, eitt nú eftir havtasku, búrfiski og øðrum fiskasløgum, eigur fyrst at verða kannað, um skip, sum hava veiðuloyvi til botnfiskaveiðu, eru nýtilig til henda fiskiskap, og um anararnir eru áhugaðir at láta frá sær botnfiskaloyvið

heilt alla lutvist afturfyri loyvi til nyggja veiðu.

At flyta inn skip til slíkar møguleikar kemur í aðru rað; men sjálvandi er í avisum føri neyðugt at útvega skip, tá hóskandi skip ikki eru í flotanum; men verður hetta í flestu førum til møguleikar á oðrum leiðum ella litið troyttar stovnar t.d. í "joint venture" við aðrar, ella til svartkjaft, lodnu og rækjur.

Vert at nevna Skálafjall (nú Beinir). Vit hava eitt nýmótans skip, ið hevur nógvar møguleikar. Veiðan í Irmingerhavinum er gott dømi, og eiga vit í komandi ári at gera meiri burturur við teim storu trolarunum. Hugsað verður um at steingja veiðuna í Barentshavinum avisa tíð, so teir kunnu fara í Irmingerhavið.

Landsstýrið hevur eisini góðkent ætlan, har vit fara at hava ein nýmótans frystilinubát, ið annars hevði farið av landinum, og kunnu vit við hesum økja um fiskiskapin í altjóða sjógvi.

Ætlanir eru eisini um at láta djúpvatnsskipini royna aðrar leiðir, so trýstið á grunnarnar minkar, og er landsstýrið sinnað at loysa hesi mál.

Royndir at fáa skip til fiskiskap á fjarleiðum hava annars ikki hepnast væl, hóast landsstýrið hevur latið nakað av studli. At kalla eingi uppskot eru frá vinnuni og tørført er at útvega neyðuga figging at fara at veiða á fjarum leiðum.

Landsstýrið heldur, at tað fer at eydnast at minka passaliga um veiðuflotan - serliga trolarapartin - sum royndir eftir botnfiska-stovnunum, og at hetta saman við friðingum og leguðøgum, fer at tryggja, at tilfeingi og veiðufloti samsvara.

Peningur er ikki settur á figgjarlógina til upphøgging, men landsstýrið hugsar um at útvega sær heimild at keypa skip á tvingsilssøiu, so veiðuloyvini verða færri.

Arbeiðið á okkara fiskavirkjum er ikki minkað so nógv, sum

føroysku avreiðingarnar kundu bent á. Hetta kemst av, at munandi nøgd av fiski - sum nevnt - er keypt uttanlands, tesk oila fryst.

Hetta er gott iskoyti og av stórum tydningi í eini tíð, har vinnumøguleikarnir eru fáir; men to mugu vit sanna, at iskoytið til tjóðarurtøkuna frá innfluttum fiski bara er ein fjórðingur av iskoytinum frá fiski veiddum við føroyskum skipum. Men tá ið virkini hava fingið betri kunnleika til at keypa fisk uttanfrá og prisir og goðska samsvara betur, kann hetta gerast munagott iskoyti og tryggja, at orkan á virkjunum verður betur nytt.

Veiðumøguleikar aðrastaðni enn á landleiðini

Fiskivinnusamráðingarnar oktober-januar fordu ikki til stórar broytingar í veiðumøguleikum, Barentshavið og Ísland undantikin.

Íslendingar kravdu - av støðuni í íslendska toskastovninum - rættiliga stóran niðurskurð í føroysku kvotuni og minkaði hon 3.000 tons. Roynt varð aftur í ár at fáa betri javnvág í sáttmálan av at bjóða íslendingum svartkjaft, makrel og síld. Síld og makrelur gjørdust partur í sáttmálanum.

Veiðan eftir lodnu í grønlendskum og íslendskum sjógvi sveik veturin 1991-1992. Nú tykist møguleiki verða at keypa 11.500 tons frá grønlendingum, ið kunnu verða fiskað í íslendskum sjógvi, og 10.000 tons kunnu verða fiskað undir Eysturgrønlandi (ES-býti).

Vøksturin í toska- og hýsustovnunum í Barentshavinum heldur fram, og Føroyar fingu sín prosentvísa part av vøkstrinum. Tað gevur øktar veiðumøguleikar hjá verksmiðjutrolarunum. Samráðingar hava júst verið millum Noreg og Russland at vaksa toskakvotuna í ár; men eingin avgerð er tikin um okkara part í hesum vøkstri. Møguleiki skuldi verið fyri 1.500 tonsum.

Landsstýrið hevur stuðlað royndum fyri samstarvi millum føroysk og russisk feløg, m.a. við tí fyri eyga at utvega eyka kvotu. Eisini hava samráðingar verið um 3.000 tons eyka av toski frá russum. Hesar samráðingar eru ikki lidnar enn.

Lodnukvotan á Barentshavinum í ár var rikiliga stor, og bíðað verður eftir, hvussu lodnufiskiskapurin verður á heyst.

Russland kundi ikki lata toskakvotur á Eysturskjonum í ár. Landsstýrið tók ti samráðingar upp við tey try Baltisku londini. Rammusáttmálar voru gjørdir við Estland, Lettland og Litava, og kvotur eru tøkar. Fiskiskapurin er tó sera vánaligur á løtuni; men møguleikin verður kortini at vera varðveittur.

Kvotabýtið við EF er at kalla óbroytt á 1992. Við batnaðu avtaluni um makrel við norðmenn og lodnu við russar og norðmenn, er sáttmálin grundarlag undir batnandi útliti hjá notaflotanum. Hann hevði gott ár í fjor, og helst fær hann betri úrslit í ar.

Veiðumøguleikarnir á Flemish Cap eru teir somu á ar sum í fjør; men veiðan er sera vanalig, helst av spønsku og portugisisku ovveiðuni. Tó ljóðar, at ein góður árgangur er á veg. Tað er tí alneyðugt at fáa semju um eina eftirlitsskipan á NAFO-økinum, sum forðar fyri, at søgan endurtekur seg, og skip úr Spania og Portugál fiska stovnin upp. Semja er í ár gjørd við tey skip, sum hava veiðuloyvi á Flemish Cap, at tey skifta um 750 tons av toski við grønlendsk skip. Møguleiki er so fyri 3 veiðuloyvum í Eysturgrønlandi hjá hesum línuskipum, og grønlendingar kunnu so veiða 750 tons á Flemish Cap.

Stongd oki og nógv hjáveiða við Svalbarð gav trupulleikar á vár; men tað eydnaðist at fáa semj : við Noreg um at lata uppaftur.

Grønlendska heimastýrið hevur arbeitt við eini ætlan um at steingja Eysturgrønland fyri rækjuveiðu seinna helming í 1992. Landsstýrið vísti á, at hetta kann ikki galda føroysk skip, uttan at samráðingar hava verið.

Kvotuumbýti er nú vorðið so fastur táttur í samvinnu landa millum, at landsstýrið ikki væntar tær stóru broytingarnar komandi ár.

Stuðulin til fiskivinnuna

Fyrra hálvar hevur lønjavningargrunnurin goldið 106 mill. kr. ut. Størsti parturin var kilostuðul - heilar 66 mill. kr. ella 62%, og 39 mill. kr. ella 37% eru goldin sum inntokutrygd til fiskimenn. Harumframt var 1 million utgoldin í eygleiðarastuðli til skip, sum royndu í kanadiskum sjógvi.

Arbeiðið at broyta ella leggja fiskivinnustuðulin um, heldur fram. Ein politisk nevnd arbeiðir við málinum, og hevur biðið um ummæli frá vinnuni og serkønum. Í sambandi við frihandilssáttmálarnar hava EF og EFTA sett krav um broytingar í stuðulsskipanini. Tey hava tað sjónarmið, at skal frihandil vera við fiskavørum, skulu ongar kappingaravlagandi skipanir vera. Politiska nevndin skal greiða, hvørjar stuðulsskipanir eru gagnligar í samfelagsbúskapinum og ikki kappingaravlagandi. Uppgávan er at røkka endaligum úrsliti í heyst.

Skipanin við fiskivinnuráði og fiskivinnustarvsnevnd hevur heldur ikki virkað seinasta árið. Landsstýrið fekk viðhald í réttinum, at lógin um fiskivinnuráð er rætt umsitin; men málið er kært. Landsstýrið hevur tí í týðandi málum sett seg beinleiðis í samband við vinnufeløgini, sum seta limir í fiskivinnuráðið og kallað ráðið inn. Samráðingar verða tiknar upp við feløgini at finna fram til, um lógin um fiskivinnuráð eigur at verða broytt.

**Alivinnan**

Útflutningsvirðið í alivinnuni í fjør var 545 mio.kr., og nøgdin góð 17.000 tons. Í ár verður tonsatalið helst nakað tað sama. Við prisøkingini í seinastuni verður útflutningsvirðið helst hægri enn í fjør, og sostatt gott ikast til føroyska samfelagið.

Smoltutsetingin í fjør var 8 mió. sammett við 6 mió. fyrra árið. Komandi ár verður tó ikki meir tikið, tí trupulleikarnir hava verið stórir í ár. Flestu støðirnar vóru fyri stórum felli, og stórir trupulleikar hava staðist av lusini. 54 álistoðir vóru í fjør og fyrra árið.

I ar hava 28 alistøðir sett millum 4 og 5 mió. smolt út. Tó at so nógv minni smolt er sett út, verður roknað við, at tikin verða 15.000 tons í 1994. Av tí at minni verður tikið á aliøkjum, sum eru, og alt verður longri út moti havi, fæst betri vøkstur, færri sjúkratilburðir, og tí munandi minni virkiskostnaður.

Alivinnan í Føroyum hevur havt nógvar trupulleikar í síðstuni, og nógv eru trotabúgvini. Sama er í grannalondunum. Fortreytirnar eru tí broyttar, og menn eru farnir at hugsa øðrvísi. Landsstýrið kannaði tí føroysku alifirðirnar, heilivágnýtslu, smoltútseting og aðrar umstøður árini 1985-1991, eins og tað útvegaða korttilfar yvir egnað aliøki. Kanningin vísti, at vit áttu at havt 25-30 alistøðir á aliøkjunum, sum nú eru. Skal sum mest fáast burturur, átti hvør alistøð at havt trý øki at skift ímillum.

Reint vatn og reinur sjógvur hava alstóran týdning í alingini. Neyðugt er tí at vísa keyparalondunum á, at tað er reint, har ið fiskur okkara verður aldur. Tí eru 30 alistøðir høskandi á aliøkjunum, sum nú eru. Men vit eiga at hava fleiri støðir enn hesar 30, og er tí neyðugt at royna nýggjar leiðir við størri umskifting. Landsstýrið fer tí at gera streym- og aldukanningar og merkja upp, hvar ið tað tøkniliga er møguligt at ala, so teir, ið dirvi hava, fáa møguleika so hvørt tøknifrøðin mennist.

Almenna fiskasjúkutænastan hevur nú tveir fiskasjukudjóralæknar, er betur før fyri at nøgta tørvin hjá alarunum, og kann fara undir fyribyrgjandi arbeiði. Útlit eru fyri, at tamarhald fæst á laksalúsini, ið hevur verið alivinnuni til stóran bága. Nýtt evni (brintyvirilta) verður nú nýtt, og tað hevur fleiri fyrimunir: eitt nú verða vatn og sjógvur ikki dálkað, og afturhaldstíðin er sett niður úr 14 døgum í 1 dag.

Alarar í Noregi, Skotlandi, Hettlandi, Írlandi og Føroyum hava í seinastuni fyrireikað eina samskipan á marknaðinum fyri at fáa samsvar ímillum eftirspurning og tað, ið útflutt verður, v.ø.o. at byrgja fyri ovaling og prisfalli. Landsstýrið stuðlar skipanini og hevur samtykt at leggja uppskot fyri tingið um aligrunn,

ið kann tryggja prisin. Vinnuni eru játtaðar 500.000 kr. í ár, so skipanin saman við hinum vlaralondunum fest at virka. Politisku myndugleikarnir í hesum londum taka undir við ætlanini og ætla at sleppa undan trupulleikunum á laksamarknaðinum.

Samanumtikið eru utlitini ikki so døpur, sum mangur mæti fyrr í vár. Vónandi gerst aligrunnurin ikki snælda, sum henda lutfalsliga stuðulsfria vinna kann draga sær studning uppá. Tá er meira mist fyri minni.

## Iðnaður og handil

Iðnaðurin stendur fyri stórum avbjóðingum. Krøvini til kappingarførni herðast, og vinnan skal laga seg til nyggjar kappingartreytir, javnsettar teim í øðrum londum.

Við nyggju tollløgini fingu mestsum allar vørur ur EF tollfrælsi; men GATT-viðurkendur tollur varð lagdur á vørur ur øðrum londum. Gomlu innflutningsgjøldini galda tó árið út, og tollurin fyri týdningarmestu vørurnar ur EFTA-londum er undir samráðingum fyribils frásettur. Henda fráseting ("suspensión") fellur burtur 1. september í ár, ti tá hava vit eins góðan handilssáttmála við flestu EFTA-londini og sáttmalan við EF.

Árið 1992 verður tillagingarar, og flestu av teimum gomlu skipanunum eru framvegis í gildi við avisum lætta hjá vinnuni, Innflutningsgjøldini á maskinum og iløgutólum, sum falla burtur 1. januar eru minkað ella strikað, at virki ikki skulu bíða við iløgum, til meirvirðisgjaldið kemur 1. januar.

Meirvirðissjaldsskipanin leggur avgjald á nytsluna, har skipanin, ið er, í nógvum førum leggur tað á vinnuna. Virkini verða at krevja avgjaldið inn og avrokna við landskassan, men skulu ikki bera avgjald av vinnuni. Skipanin lættir um útflutningsvinnuna og landsumsitingina, men krevur, at landið ikki stuðlar føroyskari vinnu við lægri avgjøldum, ið skattaborgarin umvegis ber. Landsstýrinum er greitt, at nøkur av teimum smáu

virkjunum og fleiri av teimum, sum serliga hava livað av muninum í innflutningsgjaldi á ravøru og lidnari vøru, fáa trupulleikar av broytingunum, og summi megna ikki at standa seg, fáa tey ikki tolllætta eila stuðul. Men hetta eru so treytirnar fyri, at okkara vørur sleppa undan tolli aðrastaðni.

Fyri heimaidnaðin liggja trupulleikarnir í ti sera veika heimamarknaðinum. Heimamarknaðurin fer ikki at vaksa aftur, fyrr enn útflutningurin hevur ment seg munandi. Tað er tí sjálvsagt, at landsstýrið leggur mesta dentin á at stimbra útflutningsvinnuna og at eggja til, at tað besta fæst burtur úr henni.

Vørumenningarlógirnar frá 1991 og 92 um stuðul til arbeiðsskapandi tiltøk á landi hava roynst væl og stimbrað lógur og virksemi á fiskavirkjum. Tær hava verið galdandi eitt ár í senn, og ein lóg fyri 1993 fer eins og hinar at stuðla fortreytunum at gera meirviðgjørdar vørur til kræsnar marknaðir.

Fiskiidnaðurin hevur góðar útflutningssømdir í nýggja EF-sáttmálanum, bæði fyri fullvirkaða vøru, ta óvirkaða og hálvvirkaða vøru, og handilssáttmálin við EFTA er ikki verri. Fýlst hevur verið á, at kvoturnar til EF fyri fullvirkaða vøru hava verið ov smáar, og at tað ikki eydnaðist at fáa sersømdir fyri triðjalandsfisk. Í samraðingunum við EF gjørdi landsstýrið nógv burturur tí at fáa so stórar kvotur fyri fullvirkaðar fiskavørur sum gjørligt og at kunna hækka kvoturnar við samraðingum í felagsnevndini. Hetta fer at bera til og hevur sera stóran týdning, tí fullvirkaðar vørur fáa frægasta prísin og bera við sær fjølbroytt arbeiðsskapandi virksemi í landinum.

Tað, sum okkara fiskifloti fiskar, eigur at verða avreitt og arbeitt í Føroyum til vøru, lidna á borðið um til ber. Fesk, ísað vøra eigur bara at verða útflutt til sera høgan prís til brúkaran beinleiðis og ikki til meiri virkingar á meginlandinum. Tað er at fegnast um, at tann parturin av veiðuni, ið verður goðskaður á landi, veksur skjótt, og at royndirnar í fiskiidnaðinum at gera framkomnar borðbærar vørur eru komnar so langt áleiðis, at tær

fyrstu helst fara á marknaðin í heyst.

Skipasmiðjurnar hava tíverri ikki megnað at fingið sáttmalar um nybygging, hoast fíggjarligu fortreytirnar eru av teimum frægastu í vesturheiminum. Harafturímoti veksur umvælingararbeiðið fyri eystureuropeisk skipafeløg, og roknað verður við stóðugum arbeiði í vinnugreinini eitt ár fram. Útflutningurin av tøknifrøði í fiskivinnuni er alsamt vaksandi, og nógvar samráðingar eru um nýggjar sáttmálar.

Nýggju handilsáttmálarnir

Tó at sáttmalarnir við EF og EFTA ikki nøgta allar ætlanir og vónir Føroya, eitt nú fritt at fara hjá føroyingum í vinnu og útbúgving, so heldur landsstýrið tær vera væl nytiligar og arbeiðir við at fáa slíkar sáttmálar við onnur lond eisini, eitt nú USA.

Spurningurin um broytingar í handilssáttmálanum við EF er tikin upp í felagsnevndini á fyrsta fundinum. Á fundinum í heyst, rokna vit við, at "ekvivaleringin" kemur í rættlag, og at vit fáa somu sømdir, sum EFTA-londini hava í EBS-sáttmalanum.

Í samráðingunum við EFTA-londini er landsstýrið komið so langt við norðurlondunum, at hesir sáttmalar kunnu nýtast til at seta nýggjar spurningar í felagsnevndini. Tað er kortini greitt, at ikki verður møguligt at veita beinleiðis studning eftir 1. januar 1994, ti tá skulu studningsskipanirnar vera í samljóði við tær reglur, ið bæði EF og EFTA halda seg til.

Tað skilst, at bæði EF og EFTA veita stuðul eftir serligum reglum, og landsstýrið hevur ti fingið nágreiniligt yvirlit yvir teir studningshættir, ið eru loyvdir. Tó skerst ikki burtur, at vit valla orka at veita stórvegis almennan studning uttan inntøkuhækkingar ella sparingar.

Stórsta stuðulsorkan skal nýtast at gera fortreytirnar lagaligari, t.d. at lækka elprísin til vinnulívið, at bøta um kappingarføríð. Siglingin hjá Smyrli til Aberdeen og Scrabster bøtir

eisini um fortreytirnar. Møguleikarnir fyri iløgufeløgum í Føroyum verða eisini kannaðir, tí føroyska vinnulívið er so kapitalfátækt, at neyðugt er at finna nýggjar leiðir til tess at stimbra iløguhugin í lønandi virki.

Tann vørumenningarstuðul, ið latin verður, skal tiskil ggja a pris- og marknaðarutlit. Tað er jú brukarin, ið setur ' sin, og tí ræður um at gera tær vørur, sum hann vil lata mest yri.

Við løgini í vár um at flyta inn og flyta út fisk og fiskaúrdráttir vildi landsstýrið tryggja dygdarvøru úr Føroyum. Við løggildingini fáa keyparar okkara uttanlands trygd fyri, at fiskasølur í Førcyum eru álítandi í søluviðurskiftum og kunnu veita endurgjald, um hetta gerst neyðugt.

Sáttmalin við EF setur krav um, at føroysk virki og fiskiskip verða løggild eftir komandi EF-reglum. Hetta greiðir okkara eftirlits- og góðkenningarskipan longu, og virki og skip eru við hesum skipanum komin longri enn onnur. Tað verður kortini tungt at fáa øll fiskiidnaðarvirki og skip løggild innan 1. januar 1993, men tað er so treytin at virka til europeiska marknaðin. Strongu krøvini koma okkum til góðar, tá ið talan er um at arbeiða vøru til onnur lond, ikki minst tá ið triðjalandsvøra ella onnur innflutt vøra skal verða arbeidd.

Ikki er yvir at dylja, at vinnuliga rekur harðari á hjá okkum, og allar snildir mugu til at fáa gongd á aftur. Men landsstýrið hevur tað álit, at avmarkaði stuðulin og herdu umstøðurnar, vinnulívinum eru fyri, fara ikki at taka áræðið frá fólki, men heldur styrkja hugin og viljan at ganga nýggjar leiðir. Vit ivast ikki í, at tað fer at hilnast, gera vit okkum púra greitt, hvørjum fortreytum vit skulu virka undir, og fara undir tillagingarnar, áðrenn veruleikin er har. Hesar trupulleikar skúgva vit ikki til viks.

Sjóvinnumál

Hin 4. juni 1992 setti landsstyrið í gildi Føroyska Altjóða Skipaskrá við serstakari løgtingslóg og broytti manningarlógina og sjóvinnulógina, broytti løgtingslógina um skipaskraseting og skatt. Higartil eru 10 skip skrasett í FAS. Flest skipini voru oil í vanligu skrásetingini - tey vóru norsk. Fyrispurningar koma javnan úr útlondum, og verður tí upplysingartilfar gjørt.

Hóast skattaafturbering, sum í inntøkuárunum 1992 og 1993 er sett til 28%, og hóast reglurnar í manningarlógini eru tillagaðar altjóða krøvum um minsta krav geva fyrimunir, er ov tíðliga at siga nakað um, um farmaskipaflotin undir føroyskum flaggi fer at vaksa. Útlendsk reiðarafelag við áhuga fyri FAS mugu gera upp, hvørjar aðrar útreiðslur enn beinleiðis hýrukostnaðurin ávirka raksturin undir føroyskum flaggi. Loyvt er at hava útlendska manning, tó skal skiparin vera ríkisborgari. Tað vísir seg, at ongin trupulleiki hevði staðist av at kravt, at ávísur partur av manningini var føroyskur, og fleiri føroyingar hevdu fingið hýru.

Tryggingin er týðandi táttur í skipanini. Skip undir FAS verða tryggjað í Føroyum. Hetta er ein avbjóðing hjá Sjóvátryggingini, tí tøkniligu treytirnar eru tær somu sum í vanligu skrásetingini og ájavnar donskum krøvum, sum eru tøkniliga goðar.

Sum gongdin er í Europa, fer EF at hava eina EUROS-skipaskrá í 1995 við treytum, sum gera tað trupult hjá limalondunum at hava sína egnu altjóða skipaskra, har tey m.a. hava ikki loyvi at sigla millum EF-havnir. Hetta kann elva til størri føroyskan farmaskipaflota undir FAS.

Sjómanslógin frá 1988 verður ikki sett í gildi í tí líki, hon er. Sjómanslógin frá 1967 verður tí galdandi enn eina tíð. Broytingaruppskot verður lagt fyri tingið við atliti at reglum at tryggja fiskimonnum inntøku, um hvíldarreglur, uppsagnarreglur, heilsutænastu fyri sjómenn, avfaringarreglur, heimferðarreglur, reglur um skipstænastu umborð, vernd fyri heilsuskaða, kostreglur,

mistar ognarlutir og sjukrarokt.

Kunngerð um tryggleikaarbeiði er sett i gildi og reglurnar um heilsutænastu hjá sjófólki eru gjørdar i samrað við deildina fyri arbeiðs- og almannaheilsu, sum skal umsita skipanina. Við .:sum verður kravt, at sjómenn verða kannaðir regluliga hjá lækna annaðhvørt ár sambært millumlandasattmalanum hja ILO.

STCW-sáttmálin um sjovinnuútbúgvingar, um sjóvinnukrøv og vaktarhald á sjónum hevur verið galdandi i Føroyum síðani 18. september 1990. Kunngerð um vaktarhald a skipum verður sett i gildi samsvarandi manningarlógini.

Broytingarnar i sjóvinnulógini føra við sær, at landsstýrið kunnger nyggjar reglur um siglingartið til tess at fáa sjóvinnubræv.

Ein samstarvsavtala er gjørd við Søfartsstyrelsen um umsiting við sermálum hjá landsstýrinum. Sjóvinnufyrisitingin, skipaeftirlitið og seinni skipaskrásetingin verða undir somu lon við lutvísari felagsumsiting til tess at lækka útreiðslurnar.

## Landbúnaður

Nyggja jarðarráðið skipaði seg i fjor. Landsstýrið hevur havt fleiri fundir við ráðið um vandamál i landbúnaðinum. Eitt teirra er teir nógvu nyggju garðarnir. Landsstýrið heitti ti á Jarðarráðið um ikki at stuðla fleiri fleiri nyggjum gørðum, men heldur menna teir, ið eru. Hesum tók Jarðarráðið undir við.

Landsstýrið ætlar saman við landbúnaðinum at broyta javnvágina millum studningar, so størri partur fer til hoyggj og súrhoyggj. Arbeiðið er farið i gongd, men verður drúgt, ti rættuliga umfatandi kanningar eru neyðugar, áðrenn vit sleppa undan at flyta inn so nógv útlendskt fóður.

Landbúnaðarráðgevastarvið og seyðaráðgevastarvið verða løgd

saman. Seyðaroyndir verða gjørdar úti á gørðunum heldur enn á Royndarstøðini, sum nú.

Landsstýrið hevur biðið stjóran og nevndina á Royndarstøðini endurskoða bygnaðin og broyta hann, so raksturin verður biligari, og at størri dentur verður lagdur á beinleiðis rakstrarroyndir, sum landbúnaðurin kann taka eftir beinleiðis.

Roynt verður at fáa meiri fyri ullina, og líkt er til, at tað fer at eydnast, so at tað aftur fæst nakað burtur úr ullini.

## Nýggjar vinnugreinir

Føroyar eiga eitt virkið og dugandi fólk, væl skulað og við nógvum royndum í vinnulívinum. Eyðvitað er, at nú tað eina tíð er trongri til vinnu heima, so leita fólk burtur í vinnu ella útbúgving. Hjá landinum er tað týdningarmikið, at tey, ið burtur fara, framvegis kenna seg sum part í føroyska samfelagnum, soleiðis at handaligi og bókligi kunnleikin, nomin er uttanlands, seinni kemur samfelagnum til góðar.

Eitt nýtt er í tí, at føroyingar hava verið kærkomnir uttanlands. Bæði á skipi og í virki hava teir rókt týdningarmikil størv. Tíverri mega vit ásanna, at vit hava verið rættuliga eiðasørir at skipa slíkt virksemi sum tænastu úr Føroyum. Okkum dámar at ganga hvør sína egnu leið. Tørvur er tó á ráðgevandi virksemi, ið gevur møguleika at virka í ráðgeving og leiðbeining, sum er fyriskipað úr Føroyum. Í hesum krevst ikki sama tillaging sum onnur einstaklingavinna á meginlandinum, ið noyðir menn at flyta úr Føroyum at fáa virkisrætt í felagsmarknaðinum. Men kortini verða vit at taka upp betri samvinnu við EF og EFTA-londini at tryggja okkum øll fýra frælsini, og samvinna um útbúgving, gransking og menning, ið hava so stóran týdning í framtíðarmøguleikum okkara.

Slíkar avtalur fara eisini at gera okkara virki og einstaklingar før fyri at virka, arbeiða og veita tænastur, eitt nú í olju-

vinnuni alla a peningaøkinum.

Samráðingarnar við Ongland og Danmark um undirgrundarspurningin eru ikki loknar. Hóast hetta heldur landsstýrið tað vera rætt at stuðla og eggja fólki til útbúgving í hesi vinnugrein, ið kann gerast partur í lívsgrundarlagnum í Føroyum.

Vinnulívslóggáva

Í fjør valdi landsstýrið nevnd at endurskoða partafelagslógina, iroknað reglurnar um ársroknskap, banka- og sparikassalógina, bókføringarlógina, grannskoðaralógirnar og lóg um vinnufelagaskráseting. Fleiri av hesum lógum eru gamlar danskar lógir frá triatiárunum. Serliga er tað banka- og sparikassalógin og partafelagslógin, iroknað reglurnar um ársroknskap, sum ikki longur nøgta tørvin hjá vinnulívi og lánsveitarum. Atrokandi mál eru t.d. minsta kravið til partapening, og um roknskapir hjá partafeløgum skulu vera almennir.

Nýggj útflutningslóg fyri fiskavørur var samtykt í var og setur teimum, sum flyta inn og út fisk og fiskaúrdráttir, krav um løggilding. Hesi skulu kunna veita trygd fyri endurgjaldskrøvum, so byrgt verður fyri, at teir inn- og útflytarar, ið bara virka við løtuvinningi fyri eyga, kunnu ávirka umdømi Føroya sum heild.

Løgtingið samtykti eisini nýggja lóg um priseftirlit. Gamla lógin var rein prislóg, sum í høvuðsheitum bannaði høgum prísi og stórum vinningi. Hetta er galdandi í nýggju prislógini, men skal hon harumframt byrgja fyri kappingaravmarkandi tiltøkum. Hetta er í samsvar við gongdina í grannalondum okkara, har denturin alt meira verður lagdur á kappingar- heldur enn á prisviðurskifti.

**Ferðavinnan**

Ein væl skipað ferðavinna, sum allir borgarar kenna seg vara av, kann - sum fra líður - gerast eitt hampuligt ískoyti til landsins búskap og trivnað.

Leiklutur landsins er at tryggja hollan grundvøll, sum skapar fortreytirnar fyri ætlaðu menningini á hesum øki, og stuðla upp undir tilboðini, sum "tað privata" eigur at standa fyri og bera ábyrgd av. Hetta krevur stóra vitan og innlit. Kannað má verða, roynt og arbeitt miðvist við heildarloysnum, heldur enn at loysa smámálini hvørt sær. At gera dygdargóð tilboð og at selja krevur eisini vitan, dugnaskap og samstarv í vinnuni, og við fyriskipandi myndugleikarnar, fyrst og fremst Ferðaráðið, ið hevur virkað í gott og væl eitt ár.

Ferðapolitiska stevnuskráin, ið setur setningin fyri komandi árini, hevur verið til viðgerðar í vinnu og í fjølmiðlum. Landsstýrið kemur fyrsta dagin við uppskoti um, hvussu neyðug tiltøk skulu greiðast fíggjarliga, íroknað eisini býtið millum vinnuna og tað almenna.

Fleiri lógir hava ávirkað ferðavinnuviðurskiftini, t.d. broytingin í rúsdrekkalógini, heimildin til tollfría sølu á flogvøllinum, afturlatingarlógin og kunngerðin um kunningarstovur.

Av størri týdningi í vinnuni er eisini, at Smyril er farin at sigla til Skotlands, at ferðaseðilin millum Føroyar og umheimin yvirhøvur kostar minni, at Tórshavn hevur fingið eina farstøð, og í útlondum bjóðar seg fram sum stevnuby.

Ferðafólkaviðurskiftini á fleiri plássum, t.d. í Mykinesi, eru batnað nógv, og posthús og bensinstøðir eru so smátt farin at virka sum kunningarstøðir hjá ferðafólki. Tikið hevur verið væl undir við ymiskum útbúgvingartilboðum og útbúgva fleiri enn 40 seg sum ferðaleiðarar. Hugurin at gera framtøk er eyðsýniligur.

<u>Skúlamál</u>

Í løgmansrøðuni 1991 varð boðað frá, at ætlanin var at broyta fólkaskúlalógina frá komandi skúlaári. Við grundarlagi í áliti frá lesiætlanarnevndini var lógaruppskot gjørt, sum síðst í farnu tingsetu varð samtykt. Nakrar broytingar krevja fyrireikingartíð,

og fáa partar av lógini tí ikki gildi fyrr enn 1. august 1993. Samtyktu broytingarnar eru bara nakrar av teimum, sum lesiætlanarnevndin skjeyt upp, og verður tí framhaldandi arbeitt við fólkaskulalógini. Møguliga verða aðrar smærri og stórri broytingar skotnar upp í komandi ári; men havt verður í huga nýggj fólkaskúlalóg, ið eigur at koma í gildi fyri aldarskifti.

Ursliti av orðaskiftinum seinastu tingsetu um miðnamsutbúgvingar var, at løgtingið bað landsstýrið beinanvegin gera lógaruppskot um handverkaralærlingautbúgvingar, ástøðiligar útbúgvingar á tekniska skúla, studentaskúlaútbúgvingar og miðnamsdeplar. Men slíkt arbeiði er drúgt, og einasta lógaruppskot, ið varð liðugt og samtykt, var løgtingslóg um stoðisutbúgving í tøkni. Hóast langt var útliðið, áðrenn lyst varð við hesum útbúgvingartilboði, var áhugin ógvuliga stórur, og fleiri umsøkjarar voru, enn skularnir kunnu rúma.

Arbeitt verður við nýggjari lóggávu fyri handverkarautbúgvingar, við lóg fyri tekniskar skúlar og við nýggjari skipan fyri studenta- og HF-útbúgving er byrjað í smáum. Ferð verður sett á nú.

Skipanin við miðnámsdeplum er enn ikki sett í verk, tí ivamál eru um, hvussu miðnámsútbúgvingarnar best verða skipaðar.

Í seinastu tingsetu varð løgtingslóg um maskinmeistarautbúgving og aðrar el-tøkniútbúgvingar samtykt. Lógarkarmurin um hesar útbúgvingar er nú á fyrsta sinni í lagi.

Løgtingslógin um húsarhaldsskúlar, ið varð samtykt í vár, tryggjar innihald og grundarlag. Lógarheimild er nú at fara undir aðrar útbúgvingar á hesum øki.

Í eini fyribilsskipan tók Klaksvíkar Sjómansskúli ein sjóvinnuflokk inn í august í fjør og tveir í januar. Vónandi ber til at taka ein flokk aftur inn í august. Væntandi verður nýggi bygnaðurin í sjómansskúlaútbúgvingini settur í verk eftir nýggjár.

í góðum tíðum ber nógv til, og minni verður hugsað um kostnaðin. Landsstýrið fer at virka fyri samstarvi millum tær hægru útbúgvingarnar, so vit fáa meiri burturur fíggjarligu orkuni. Nakrir útbúgvingarstovnar eru farnir undir hetta.

Ílogur til skúlabygging hava ikki verið tær nógvu. Tó, studentaskulabyggingin a Kambsdali gongur eftir ætlan, og skulin verður liðugur eftir summarfrítíðina 1993. Rúmviðurskiftini hjá HF-útbúgvingini í Vági hava leingi verið ógvuliga vánalig. Nú er samtykt at keypa gamla posthúsið í Vági til hetta endamal eftir neyðuga umbygging. Aðrir óloystir høllisspurningar verða tiknir upp til komandi fíggjarlógaruppskot og íløguætlan.

## Mentanarmal

Í fjør heyst kom álit um útvarps- og sjónvarpsviðurskifti. Álitið varð sent stovnum, felagsskapum og kommunum til ummælis. Eftir ummælunum hevur landsstýrið samtykt at gera nýggja lóggávu fyri útvarp og sjónvarp sum sjálvstøðugir stovnar.

Seinastu tingsetu samtykti løgtingið lóg um skjalasøvn. Hesar lógarreglur samsvara lógarreglunum um skjalasavnavirksemi í grannalondum okkara.

Embætismannanevndin við fýra limum er settur at kanna føroysku áhugamálini í donsk-norsku skjalasavnaavtaluni. Danska mentamálaráðið tilnevndi ein, danska ríkisskjalasavnið ein, og landsstýrið tilnevndi tveir. Nevndin hevði sín fyrsta fund í februar í ár í Keypmannahavn og ætlar at hava næsta fundin í Føroyum.

Fyrisitingin hjá kirkjustjórnini, sum var hjá ríkisumboðsmanninum, er flutt til stiftsstjórnina, nú Stiftsstjórn Føroya er sett á stovn og hevur skipað egna fyrisiting.

Í vár legði landsstýrið uppskot til lóg um studning at byggja bygdar- og býarhús o.a. Málið var eftir 1. viðgerð beint í skúla- og mentanarnevnd løgtingsins, men kom ikki aftur úr nevnd.

Tað gongur, sum ætlað, at byggja upp listaskalan, og verður skálin reistur í august mánaði og væntandi liðugur í 1993.

## Lógamál

Fyrisitingarlóg og lóg um innlit í fyrisitingina voru lagdar fyri tingið í vár og hava fingið fyrstu viðgerð. Tær liggja nú í rættarnevndini, sum væntandi leggur alit fram í komandi tingsetu. Saman við skjalasavnslógini verða tær gott grundstøði at fáa skipað virksemi á hesum økjum.

Landsstýrið hevur sett nevnd at arbeiða við lóggávu og skipan av almennum og privatum telduskráum við persónsupplýsingum, og hevur samtykt av leggja fram uppskot um nýggja lóggávu tíðliga í heyst.

Løgtingið samtykti í vár lóg um rusdrekka. Partar av lógini eru settir í gildi, reglur eru gjørdar fyri skeinkiloyvi, loyvisnevnd er vald, og fyrstu skeinkiloyvini eru givin. Eftir ætlan verður øll lógin sett í gildi í heyst, tá ið Rúsdrekkasøla landsins fer undir virksemi sítt.

Nakrar smáar broytingar eru gjørdar í ferðslulógini, og helst verða onkrar gjørdar afturat skjótt, men rættast er eftir landsstýrisins meting at taka lógina til viðgerðar undir einum. Arbeitt verður við at fáa nýtt køyrikort. Landsstýrið hevur viðgjørt málið bæði viðvíkjandi útsjónd og útskrivingarmynstri. Endalig støða er tó ikki tikin, men verður tikin heilt skjótt.

## Arbeiðsmarknaðarmál

Tølini fyri arbeiðsloysið eru enn høg, og tiltøkini frá politiskari síðu at skapa fortreytir fyri øktum virksemi hava enn ikki munað nóg mikið. Aðrar royndir bøta tó um, men vit basa ikki arbeiðsloysinum heilt, fyrrenn menningin í fiskiiðnaðinum og neyðuga søluarbeiðið eru so góð, at nakrar hundrað milliónir fáast í eyka útflutningsvirði.

Fyribilsverkætlanir eru hinvegin á gongd sum arbeiðsskapandi tiltøk. Tey eru tilboð heldur enn beinleiðis stuðulsveiting; men tó eingin varandi loysn. Av oskiljandi orsøkum fekk t.d. Norðlýsisætlanin ikki ta mottøku, roknað var við. Tónandi er ikki talan um, at ungdómurin ikki er nog virkisfúsur.

Virkin arbeiðsávising er alneyðug, skal login um arbeiðsloysistrygging roynast. Stýrið fyri hesi skipan hevur sett stjóra og starvsfólk og gjørt reglur um viðurskiftini hjá fiski- og utróðrarmonnum. Mánadagin skipanin, ið er lógarbundin skipan fyri allar løntakarar og arbeiðsgevarar, við.

Landsstýrið heldur tað vera rætt at láta partarnar á arbeiðsmarknaðinum hava fulla fíggjarliga og umsitingarliga ábyrgd av skipanini, og hava teir sýnt, at hesa ábyrgd megna teir. At sáttmálarnir á arbeiðsmarknaðinum vóru longdir í sama viðfangi, ger skipanina til ein varða í skilagoðum arbeiðsmarknaðarpolitikki.

Í fjør var broyting í lógini um Trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir gjørd, soleiðis at løn í uppsagnartíð fall burtur. Soleiðis vóru allir løntakarar javnsettir við tey tímaløntu.

Arbeiðsmarknaðareftirlønin fór at virka 1. januar. Hóast nakað skerd, so tó ein skipan við samábyrgd. Í grunninum eru longu 15-20 mió. kr. og útgoldið verður sum ætlað í 1997.

Í januar bað landsstýrið løgtingið leggja upp í trætuna millum Føroya Reiðarafelag og nøkur yvirmannafeløg við semingsuppskotinum sum grundarlagi, tí vandi var fyri, at stór samfelagsvirði fóru fyri skeyti. Slík uppilegging átti ikki at verið neyðug, tí hon undirgrevur skipaðu viðurskiftini á arbeiðsmaknaðinum.

Í apríl gjørdust vit limir í Felags Norðurlendska Arbeiðsmarknaðinum. Men tá ið Danmark og EFTA-lond gjøgnum EBS-avtaluna gera tillagandi EF-reglur hesum viðvíkjandi, er vandi fyri, at Føroyar og Grønland verða triðjalond, tá ið flutt verður millum t.d. føroyska og danska arbeiðsmarknaðin. Hetta kann bara í sær, at

neyðugt verður at søkja um arbeiðsloyvi í Danmark, sum vit annars áður hava ikki gjørt. Hesum verða vit at arbeiða ímóti.

Íbúðamál

Lánspolitikkur Húsalánsgrunsins verður kannaður. Játtanin á fíggjarløgtingslógini er minkað nógv, og við økta lánsvirkseminum er eginognin sum partur í útlánum minkað. Hon er í løtuni 38% av útlánsupphæddini; men fer hon niður um 33%, falla fleiri lán hjá Húsalánsgrunninum til gjaldingar beinanvegin.

Endamál grunsins er at veita bilig lán til setnus. Tí mega ískoytislán, renta og avdrattartíð stillast eftir hesum, og spurningurin, um grunnurin framhaldandi skal reka vanligt bankavirksemi, verða tikin upp í samband við fíggjarlógina fyri 1993.

Arbeitt verður við at laga virksemi grunsins, so grunnurin, tá ið nýggja banka- og sparikassalógin kemur í gildi, fær betri raðfesting í lánunum til setnús og íbúðir.

Heilsumál

Íløguvirksemið á heilsuøkinum er minni, tó verður bygt upp í Suðuroyar Sjúkrahús - tó nakað minni enn ætlað.

Ætlanirnar viðvíkjandi Landssjúkrahúsinum eru nú overuligar, men starvsfólkabólkarnir eru samdir um, at umflyting innan verandi karmar er vánalig loysn. Heldur eigur helvtin av nýbyggingini at verða gjørd í senn. Fyrireikað verður tí ein stigvís nýbygging, sum rakstrarliga verður tikin í nýtslu so hvørt.

Støðan á Klaksvíkar Sjúkrahúsi er so mikið góð, at til ber at steðga á.

Sparingar hava verið álagdar sjúkrahúsverkinum, og komandi játtanirnar fara ikki at vaksa sum fyrr. Tí verður neyðugt, at sakkøn fólk gjølla greina sjúkrahúsverkið fyri at táa at vita,

hvat hvør sergreinardeild fer at kosta, hvussu tað arbeiðsbyrðan verður og innihaldið, t.e. raðfesta allar sergreinadeildir.

Landsstýrið hevur framvegis tá áskoðan, at trý sjukrahús skulu vera í Føroyum. Meira átrokandi verður at fáa samskiftið sjukrahúsanna millum at virka. At hetta hevur verið so torført -hóast allir læknar eru settir í heilsuverki Føroya - er lit at skilja.

Trupulleikarnir seinastu dagarnar á Landssjúkrahúsinum eru nú loystir, og veitt er eykajáttan 6,5 mió. kr. Neyðugt verður at leggja niður 45 ársverk seinasta fjórðingsárið, men miðað verður ímóti, at eini 25-30 ársverk verða sett aftur 1. januar 1993. Hildið verður, at forsvarligur rakstrarkarmur verður tokkin í 1993 við eini játtan, sum er 212-218 mió. kr. Gongdin í hesum mali hevur vist, at neyðugt verður at endurskoða og samskipa stýrisviðurskiftini í føroyska sjukrahusverkinum.

Í tannarøktini verður ítøkiligt uppskot um, at øll børn undir 16 ár fáa ókeypis tannarøkt, viðgjørt saman við kommununum.

Á skúlalæknaøkinum verður roynt at fáa heimild frá heilsumálaráðnum til, at fleiri læknar átaka sær uppgávuna á sama øki, ti trupulleikar eru at loysa málið í Havn.

Likt er til, at skilagóður leigusáttmáli fæst við hann, ið eigur bygningin, har Hotel Tórshavn húsast. Møguleikar eru eisini at útvega hotellinum meira húsarúmd. Neyðugt verður beinanvegin at gera ábøtur. Munnu ikki føroyingar flestir, hóast trongu umstøðurnar á hotellinum vera glaðir um eitt serføroyskt heim so nær Ríkissjúkrahúsinum.

Kunngerð er gjørd um, at vinningurin hjá apotekunum minkar munandi. Størsta ágóðan fær alivinnan. Arbeitt verður við broytingum í tilskotsskipanini til heilivág.

Nýggj AIDS-kunngerð er lýst, og AIDS-ráð er valt, sum virkar fyri at fyribyrgja og upplýsa um hesa hervirligu sjúku. M.a. er ung-

dómurin umboðaður í hesum ráði.

I ætlaðum samanleggingum á almanna- og heilsuøkinum verða nú bygnaðarbroytingar í rusdrekkavíðgerð í Føroyum settar í verk. Skotnar eru upp broytingar í rusdrekkavíðgerðini, soleið at Heilbrigdið og kostnaðarmikla avrusingin verða løgd undir sjúkrahúsverkið; men at eftirvíðgerðin framvegis kann vera antin á Heilbrigdinum, Blákrossheimunum ella sjúkrahúsinum.

**Almannamál**

Leingi hava ætlanir verið um at skipa óheftu, fakligu kærunevnd í almannamalum; men her hava nakrar lógarbroytingar verið neyðugar, og tær eru settar í verk. Ætlanin er, at kærunevndin kann fara til verka 1. januar 1993. Hetta lættir umsitingarliga um í Tinganesi, og skuldu kærumálini verið skjótari viðgjørd og tá givið borgaranum størri rættartrygd.

Nevndin, ið sett varð í 1989 at endurskoða almannalóggávuna, gavst av natúrligum og øðrum orsøkum. Eftir áheitan frá løgtinginum verður nú nýggj nevnd við manning frá Almannastovuni, landsstýrinum, samgongu- og andstøðu at endurskoða og nútímansgera lóggávuna og laga hana betur eftir føroyskum viðurskiftum.

Andveikraverndin og Almannastovan gera nú ítøkiliga ætlan at fara av Eirargarði. Dagheimið á Berjabrekku er í gerð, og gerst vónandi gott tilboð til okkara brekaðu. Í Eysturoynni er búfelagsskapur í Runavík fyri andveik, og ein vardur verkstaður er um at verða liðugur; men torført er at sleppa í gongd við nýggjum og spennandi íløgum.

Á røktarheimsøkinum er hetta fyrsta arið, skipanin við eindarprisum virkar. Tað visir seg, at tað er dýrari hjá okkum enn í Danmark, so her er gjøllari kostnaðarkanningar neyðugar. Røktarheimið í Runavík er liðugt. Her eru fýra búpláss til ung rørslubrekað, sum kunnu fáa uppvenjing til seinni at vera einsamøll. Røktarheimsbyggingin í Sandoynni heldur fram sum samtykt í trimum

eindum, nóast ikki oll halda hetta vera skilabestu loysnina. Landsstýrið hevur samtykt, at ætlaða røktarheimið í Norðstreymoy verður bygt í Kollafirði, men byggingin fer ikki í gongd, sum umstøðurnar nú eru, ti verða eisini aðrar loysnir kannaðar.

Eldrasambýli í Húsavík er tikið í nytslu. Hetta eru røktarmottakarar og røktarveitarar sera fegin um. Hetta er ein bilig loysn, og býr hin eldri í heimligum viðurskiftum. Gott hevði verið, tóku fleiri táttin upp. Vardu íbúðirnar í Havn vóru tiknar í nytslu í fjør. Tær eru fyrstar av sínum slagi, so enn eru bara fáar royndir við hesi loysn.

Atfinningar eru av og á at hoyra um almannaumsiting okkara. Hvussu er og ikki skal verða sagt, at einasti stovnur, sum við broytingini í samfelagnum við m.a. vaksandi arbeiðsloysi og sosialum trupulleikum hevur fingið øktar uppgávur, er Almannastovan. Samanborið við almannaumsiting í donskum býi við sama íbúgvaratali, er starvfólkatalið munandi minni í Føroyum.

Ætlanin at almannaverkið skal vera aðrastaðni enn í Havn er nú komin so mikið avegis, at deildin í Eysturoynni longu 1. september í ár skal taka avgerð í øllum málum eftir § 9, 13, 15 og 17 í forsorgarlógini.Í vár er ætlanin, at hesar heimildir verða lagdar til deildina í Suðuroynni. Seinni er ætlanin at leggja hesar heimildir í Norðoyggjum, sum eina tið hevur havt ávisar heimildir í samband við arbeiðsloysisstuðulin.

Vónandi kunnu slíkar deildir verða skipaðar aðrastaðni - eitt nú í Vágum, so viðgerð og avgerð liggur nærri viðskiftafólkinum. Neyðugt verður at seta fleiri starvsfólk á deildunum, tí verða starvsfólkini á Almannastovuni í Havn færri. Ætlanir eru eisini um rættiliga viðfevndar bygnáðarbroytingar í almannaverkinum. Í fyrstu syftu verður hugsað um at býta økini soleiðis, at øll vita, hvar ið trupulleikarnir verða viðgjørdir. Bygnaðurin verður tillagaður, at deildirnar eru í fleiri støðum t.e., at avgerðarheimildirnar eisini eru í fleiri støðum, so brekað fólk skuldu fingið betri tænastu.

Til tess at táa meira samansjóðað almannaverk og at spara umsitingarutreiðslur, verður fyrireikað at leggja Andveikraverndina og Endurbúgvingarstovuna saman við Almannastovuna.

Landsstýrið hevur í eina tíð havt samráðingar við partarnar um samanleggingarmøguleikar í heilsutænastuni. Tørvja er um at leggja heimahjálparskipanina og heilsu- og heimasjúkrasystraskipanina saman í eina heilsu- og heimarøkt. Hetta skuldi givið fyrimunir, tí hesar skipanir viðkoma ofta somu fólkum í sama húsi, og verður tí ikki neyðugt at samskifta við fleiri skipanir.

Møguleikin at nýta røktarheimini sum opin heim og miðdeplar fyri eldrarøkt og heimarøkt verður kannaður, og er hann sera áhugaverdur. Hetta eru moguleikar, sum ikki eiga at vera dýrari, men heldur sparingar. Endamálið er, at tilfeingið verður teim eldru at gagni, og heldur láta starvsfólkaáhugamál dvína. Tað er - hoast alt tað - alt snýr seg um.

Aðalmálið skal vera, at tey gomlu verða búgvandi heima sum longst, og at røktarfólkini sum mest eru fólk, tey eru von við.

Í donsku/føroysku nevndini viðvikjandi almannamálum verður fyrireikað, at heimild verður givin í lóggávu okkara, at veitingar til arbeiðsleys verða broyttar, soleiðis at eingin fær arbeiðsloysisstuðul, uttan at arbeiði verður boðið viðkomandi, soleiðis at tey sanna, at teirra arbeiðsorka hóast trongstøðu er neyðug. Slík skulu tó ikki órógva verandi arbeiðsmarknað ov nógv, men ótroyttir møguleikar liggja í arbeiði, sum annars liggur á láni og eigur at verða gjørt í samstarvi við kommunurnar.
Vit eru á byrjanarstigi í arbeiðsloysistrupulleikunum, og tað er tí týdningarmikið, at vit fáa broytt hugburðin um almannaveitingar soleiðis, at vit ikki fara av kósini.

**Kommunumál**

Flestu kommunur eru illa fyri fíggjarliga. Lánsskuldin er alt ov stór og nógvar hava ilt við at svara sínar skyldur. Landsstýrið

fylgir við gongdini og arbeiðir við ætlanum um nyggja kommunuskipan, sum samstundis kann bøta um møguleikarnar hjá kommunum samanlagt at koma burtur úr figgjarligu trupulleikunum.

Ein arbeiðsbolkur hevur latið úr hondum fyribils alit um framtíðar kommunalskipan. Landsstýrið viðger hetta alit, og fyrsta dagin verður arbeiðsbólkurin biðin um at arbeiða eftir meira nágreiniligum málsetningi.

**Samferðsla og samskifti**

Fleiri av dýrastu íløgunum í samferðslukervið eru um at vera lidnar. Bergholið millum Signabø og Kaldbaksbotn, havnin í Hesti, og ferjulegan á Gomlu Rætt eru lidnar umleið 1. november 1992. Eisini byggistigið í Skopunar havn er um at vera liðugt.

Íløguvirksemið á samferðsluøkinum er skert munandi seinastu árini. Tá ið seinastu búskaparligu tiltøkini vóru sett í verk, varð nógv skorið av samferðslugreinini á løgtingsfiggjarlógini.

Samsvar er nú við íløguætlanina, sum landsstýrið legði fram saman við figgjarlógaruppskotinum fyri 1992, og eigur samanumtikið at verða so við nýggjum íløgum eisini framyvir.

Sum boðað fra í løgmansrøðuni á ólavsøku í fjør fer høvuðsaenturin at verða lagdur á ábøtur og nýgerðir í vegakervinum, men minni peningur verður nýttur til nýggjar havnaíløgur.

Rakstrarliga er nú vend komin í hjá einstøku samferðslustovnunum. Útbjóðingin av flestu rutunum hjá Bygdaleiðum saman við niðurskurði í koyriætlanini minka um árliga tilskotið yvir figgjarlógina úr einum 30 mió.kr. í 1990 og einum 25 mió.kr. í 1991 niður í 17,5 mió.kr. í 1992. Árliga hallið hjá Strandfaraskipum Landsins er eisini minkað munandi. Ískoytið latið á figgjarlógini í 1990 varð 63,5 mió.kr., stovnurin hevur knappar 50 mió.kr. í halli í 1991. Men m.a. av miseydnaða leigumálinum hjá Smyrli, minni inntøkur fyri at flyta itrottarfólk og missi fyri skuldar-

ar, verður roknskaparliga hallið í 1991 kortini meira enn 54 mió.kr.

Landsstýrið hevur sett arbeiðsbólk at gera bygnaðarbroytingar á stovninum, so betri tiggjarstyring fæst í lag. Úrslitið verður helst betri tilknyti millum Bygdaleiðir og Strandferðsl.a, og ein greiðari sundurliðan millum ymsu virkisøkini hjá Strandfaraskipum Landsins, t.e. tyrludeild, reiðaravirksemi og tarmaflutningsvinnu.

Skynsemisbroytingarnar í Postverki Føroya bera nu munagóðan ávøkstur. Rakstrarhallið í 1990 var 20 mió.kr., í fjør var tað 12,5 mió.kr. , og fæst væntandi niður um 9 mió.kr. í ár. Málsetningurin er at fáa javnvág í raksturin hjá Postverkinum í 1994. Kanningarnar at privatisera postgirodeildina halda fram, og arbeiðsbólkurin kemur væntandi við eini tilráðing í heyst.

Telefonverk Føroya Løgtings er rakstrarliga komið í eina trygga legu. Tøkniliga verður hildið fram við menningini, sambært fastlagdu útbyggingarætlanini. Í sambandi við altjóða ætlanir viðvíkjandi nýggjum transatlantiskum telekaðalsambandi tvørtur um føroyskt sjóøki, eru í hesum døgum samráðingar millum donsku stjórnina og landsstýrið/telefonverkið, um at fáa samband beinleiðis við Føroyar gjøgnum transatlantiska kaðalin.

Føroyska veðurtænastan, ið nu hevur virkað eitt ár, tykist gagna teimum, sum ç ngnýta náttúrunnar tilfeingi á sjógvi og landi. Tænastan verður gjørd betri við nýggjum tólum, sum verða sett upp á flogvøllinum.

Loftferðsla

Ábøtur og uppibyggingar verða gjørdar á flogvøllinu, í Vágum, og í ár er flogbreytin asfaltløgd av nýggjum, og nýggj goymsluhøll bygd. Eftir samráðingar við danska ferðslumalaráðharran og stjóran í Statens Luftfartsvæsen verður arbeitt við at byggja upp í terminalin til m.a. "Tax-Free" sølubúðir og framsyningarøki hjá vinnufyritokum.

Ferðafólkatalið um flogvøllin veksur nu aftur, og hevur Atlantic Airways økt sín part borið saman við danska kappingarneytan. Ósemjan við ferðslumálaraðið um ferðaseðlaprísirnar er loyst, og landsstýrið hevur boðað flogfeløgunum báðum frá, at flogloyvistreytirnar skulu haldast. Kappast eigur at vera um bestu tænastuveitingina heldur enn um prísirnar. Føroyska flogfelagnum hevur enn ikki nýtst figgjarligt iskoyti - og fær tað valla.

Størsti ampin hjá teimum, sum flúgva, er vánaliga ferðasambandið millum flogvøllin og meginøkið. Hesin trupulleikin verður bara loystur til litar, um koyrisamband fæst millum Vágarnar og Streymoy. Nær farið verður undir undirsjóvartunnilin um Vestmannasund, verður viðgjørt í sambandi við komandi figgjarlóg.

Umhvørvismál

Kunngerð um hvussu lívrunnið burturkast verður burturbeint er farið at virka. Soleiðis er við kunngerðini um húsarhalds- og annað burturkast. Uppskot um kunngerð at beina burtur skarnvatnsevju verður nú send kommunum til kunningar og verður lýst í heyst.

Í seinastu tingsetu er samtykt løgtingslóg um umhvørvisgjald á smyrjuolju, og er nýggj burturbeiningarskipan undir fyrireiking saman við IRF/ROY. Nøkur áhapp hava verið seinasta árið, har oljudálking hevur staðist av. Uppruddingararbeiðið, ið Vaktar- og Bjargingartænastan hevur staðið fyri saman við lokalu bjargingarfeløgunum o.ø., hevur í flestu førum hepnast væl og givið royndir til betri eftiransni.

Arbeiðið at leggja størri part av umhvørvisfyrisitingini út til kommunurnar og at gera nýggja almenna heilsusamtykt heldur fram.

Landsstýrið hevur verið virkið í norðurlandasamstarvinum viðvíkjandi umhvørvisvernd. Serstakliga hevur verið roynt at samskipa føroysk, íslendsk og grønlendsk áhugamál. Eftir uppskoti frá landsstýrinum hevur norðurlendska ráðharraraðið sent bretsku

stjórnini skriv, har gjørt verður vart við tryggleikan, Norðurlond kenna av virkseminum á Dounreayverkinum og køstinum við geiðslavirknum burturkasti við Sellafield.

Landsstyrið hevur saman við hinum londunum í Vestnorðri fingið raðfest havumhvørvismal í fremstu rað sambært nyggja arbeiðsbygnaðinum hjá umhvørvisdeildini undir Norðurlandaraðnum. Landsstyrinum hevur eydnast at fáa Norðurlandaraðið at medvirka til og partvis rinda fyri eftiransingar- og matingarskipan hvussu føroyskt loft-, sjógv- og landøki verða dálkað, og bera mátiúrslitini saman við matingar í hinum Norðurlondunum. Skipanin verður nu fyrireikað av n.ø. fólki av Debesartrað.

Fleiri altjóða umhvørvisavtalur eru settar í gildi viðvikjandi Føroyum og fleiri bíða eitt nú Keypmannahavnaravtalan um millumlandasamstarv um oljudálkingarvanlukkur.

Serfrøðingar úr danska umhvørvisraðnum koma til Føroya og skulu saman við fyrisitingini í Tinganesi taka saman um nær altjóða umhvørvisavtalur, ið enn ikki eru lýstar í Føroyum.
Nevnast kann "Montrealprotokollatið" viðvikjandi banni fyri freon o.ø. luftevnum, ið medvirka til vakstrarhúsarinið.

Saman við umleið 120 londum um allan heimin var landsstyrið umboðað á <u>altjóða umhvørvisraðstevnuni</u> í Rio de Janeiro. Fyri danska kongsrikið undirskrivaði danski umhvørvisraðharrin altjóða avtalur, sum skulu verja fyri verðurlagsbroytingum og verja heimsins livandi kyknur og verur. Førcyski landsstýrismaðurin í umhvørvismálum og grønlendski landsstýrismaðurin í umhvørvismálum vóru hjá. Á Rio-fundinum vóru annars triggjar týðandi aðallýsingar viðvikjandi Føroyum staðfestar:

1. Alt livandi tilfeingi í náttúruni eigur at kunna gagnnýtast, so leingi nýtslan er á burðartryggum grundarlagi. Grundarlagið undir burðartrygt at gagnnyta navsins smásúgdjórastovnar, t.d. grindahval og kóp, verður asett í "regionalum" samanhangi.

2. Ongum einstøkum landi eigur at loyvast at seta tiltøk, eitt nú handilstiltøk í verk mótí øðrum landi at gagnnyta náttúrutilfeingið, so leingi nýtslan er á burðartryggum stigi.

3. Bann eigur at verða sett fyri at beina burtur geiðslavirkin og onnur dálkandi evni í havi og /ella kring havsins strendur. Hann, ið beinir burtur, hevur prógvbyrðuna móti heimssamfelagnum, at ta burturbeindað ikki er dálkandi ella skaðiligt.

Høast fámentir, og landið er lítið, fevnir okkara sjóøki - okkara ábyrgdarøki - samanlagt um einar 90.000 ferfjórðingar. Landsstýrið fer í norðurlendskum og í altjóða samanhangi at gera alt at sjógvurin og vatnið ikki verður dálkað.

Orkumál

Landsstýrið er komið væl áleiðis at viðgerða tvær kostnaðarmiklar verkætlanir á orkuøkinum. Talan er um Eiði-3 verkætlanina hjá SEV og at víðka veitingarøkið hjá hitafelagnum í Tórshavn.

Eiði-3 verkætlanin hevur verið til ummælis hjá orkuráðnum, sum heldur, at iløgan búskaparliga kann javnsetast við framhaldandi el-orku við termiskum verkum. Við atliti at, at elorkan hjá SEV er nøgtandi komandi nógvu árini, verður ein iløga í nýggj framleiðsluverk at tyngja elprísirnar, um nyiløgan verður gjørd í Eiði-3 ella í eitt nýtt dieselverk.

Útrokningarnar hjá Orkuráðnum vísa, at Eiði-3 ætlanin fer, verður hon framd, at hækka allar elprísir hjá SEV eini 5-oyru kwt., alt annað (oljuprísir o.t.) líka.

Áðrenn landsstýrið tekur støðu, skal orkuráðið kanna viðvikjandi møguligan orkumiss av Eiði-3, samanborið við, um bygt varð longur uppi. Tilmælið fyriliggur væntandi í august mánað.

Eiði-3 iløgan er mett at kosta einar 120 mio.kr., og at gera yvir góð tríy ár av 60-65 arbeiðsfólkum. Elorkan verður 14,4 GWh árliga. SEV fer nú at seta fyrstu vindmylluna upp.

Hitafelagið í Tórshavn hevur søkt um landskassaveðhald fyri iløgum at viðka fjarhitaveitingarøkið, so at avlopshitin frá SEV-verkinum verður veittur til hitamiðstøðina á Gandvíkarhjalla, og síðani hitaleiðingar lagdir út á landssjúkrahúsið. Á leiðini fæst m.a. samband við Berjabrekku, Norðurlandahúsið, Útvarpshúsið, Svimjihøllina, bygningarnar á Hálsi, SMS, Læraraskulan, Sjómansskúlan, Debesartrøð o.a. Ilogan er mett at kosta 100-110 mió.kr.

Landsstýrið vil ikki søkja løgtingið um veðhaldsheimild, og hitafelagið vil tí, at landsstýrið í staðin fyri at veðhalda, vikur við teimum pantirættindum, ið landskassin hevur av lánunum, sum áður eru veitt felagnum. Landsstyrið hevur viðgjort ætlanina og m.a. biðið búskapardeildina í Tinganesi gjørt samfelagsbúskaparligar utrokningar. Hesar útrokningar vísa, at útbyggingin kann geva samfelagsligt ikast og geva 55-60 arbeiðsmonnum arbeiði í byggitíðini.

Búskapardeildin leggur áherðslu á, at allar stórar iløgur eiga at verða bornar upp móti hvør aðrari, og við atliti at m.a. samfelagsbúskaparligum avkasti raðfestar. Hesum tilmæli ætlar landsstýrið at fylgja. Landsstyrið ætlar at fáa avgreitt umsóknirnar frá SEV og hitatelagnum í heyst.

Í januar setti landsstýrið arbeiðsbólk at kanna týdningin, elprisurin hevur í kappingarførinum hjá føroyska idnaðinum. Idnaðurin og alingin høvdu spart um 34,2 mió.kr. um streymprisurin varð lækkaður niður í 50 oyru/KWt. Tilsvarandi hevði inntøkan hjá SEV minkað 34,2 mió.kr., og skuldu allir hinir brúkararnir hjá SEV goldið munin, dýrkaði teirra streymur eini 25 oyru/KWt.

IWC og grindin

Føroysku grindadrapini hava aftur verið nógv frammi í fjølmiðlunum, serliga á 44. fundinum í Altjóða Hvalaveiðunevndini IWC. Mannagongdin er tann, at landsstýrið hugsar um at kanna statsrættarligu møguleikarnar, at fyrivarni verður tikið Føroyum viðvikjandi í IWC. Tað visir seg, at felagsskapurin ikki fylgir sínum egnu reglum og ongan dent leggur á vísindaligt tilfar. Goymda dagsskráin hjá einum meiriluta av limum í IWC er at friða allan hval.

Týdningurin av IWC er minkaður, nú løgtingið hevur samtykt, at Føroyar skulu gerast limir í felagsskapi millum Føroyar, Grønland, Ísland og Noreg at umsita, varðveita og granska hval og køp í Norðuratlantshavi, NAMMCO. Stovnandi fundur í hesum felagsskapi verður í Føroyum í september.

Samvinnan við donsku stjórnina

Samvinnan við donsku stjórnina hevur framvegis verið góð farna árið, og hava vit serliga í spurninginum um sáttmalar við útlond havt gagn av stuðlinum frá uttanríkisráðnum, serliga í EFTA-samráðingunum - har hin fyrsti sáttmálin verður undirskrivaður í Reykjavík 6. august við fyrivarni viðvikjandi løgtingssamtykt. Eisini í samráðingunum við Baltisku londini fingu vit dyggan stuðul ur uttanríkisráðnum.

Uttanríkismálaráðharrin hevur boðið føroyingum møguleika at fylgja við arbeiðnum á høvuðssetuni hjá S.T. í heyst, soleiðis at Føroyar fáa eitt umboð í donsku sendinevndina. Landsstýrið fer at svara hesum heilt skjótt.

Seinna hálvár 1991 tóktust samráðingarnar í felags undirgrundarnevndini at gera stór framstig, men tíverri kom stigur í um ársskiftið, og eru nú vónirnar um eina felags niðurstøðu ikki so bjartar sum á ólavsøku í fjør. Roknað verður við fundi á politiskum stigi seint í august, sum eina roynd at fáa nevndararbeiðið aftur á beint. Eisini tykist drúgfört at fáa endaliga semju við bretar um markið millum Føroyar og Bretland.

Spurningurin um at lýsa veruligu støðu Føroya í eini sjálvstýrislóg, er ikki gloymdur; men hevur landsstýrið boðað stjórnini frá, at vit hava eitt uppskot til samráðingar seinni í heyst.

Vónandi kunnu hesi stormál verða endaliga loyst í hesi tingsetu.

## Demokratiska skipanin og framtíðin

So mangur mælir í dag um ómegd og máttloysi. Spádómar um vánaligt framtíðarutlit verður endurtikin og endurtikin, sum hevur hann til endamáls at køva alla vón hjá vanligu føroyingunum.

Onkur heldur, at til ber at hava pottin á koki, lýkamikið hvørjum kynt verður við.

Hálvkvøðin speitattur ella smiðað søga, ið gloymir at ráka av ábyrgdarloysi, vansketni og hálvgum sviki, er dagligur partur av svartamálingini og vertin á, um kannað er til botns, hvat aftanfyri býr.

Men eisini hetta broytist og verður ov lítið at duva uppa, ti vanligi føroyingurin veit betur og dugir at sammeta støðuna nú við hana, honum hevur verið fyri fyrr í lívinum.

Hann fær ikki myndina at likjast.

Sum frammanfyri nevnt kendist støðan í dag ikki so ørkymlandi, tóku vit øll samábyrgd av loysnunum, og løgdu hvør sín lut til teirra, í staðin fyri at tey fáu bera ov nógv.

Orkan í samfelagnum og hjá okkum íbúgvum er ikki burturblivin so knappliga.

Heldur ikki er sokallaða kreppan so sjálvgjørd, sum pratið sigur, tá hugsað verður um teir nógv størru trupulleikarnar, verið hava í 20 ár inni á meginlandinum.

Har hava vit sæð, hvat ein ov brádliga rúmkaður búskapur kann bera í sær, og sjálv lærdu vit nakað um hetta áttatiárini. Men hugsa vit um, hvat land okkara hevur verið ført fyri at utvega av almennari tænastu, samfelagsútbygging og sosialari trygd seinastu 30-35 arini og um tey mongu vandamál, loysast skuldu á leiðini, so kunnu vit væl í dag taka við smærri afturstigum fyribils, fyri so at leggja á aftur.

Tað er sagt um demokratiið, at tað er ein vánalig skipan, men tó tann frægasta, sum finst.

Demokratiið og okkara politiska skipan standa ikki so høgt í metum júst nú sum onkuntið. At so skal vera, tógva framvegis mangir uppundir, og samstundis tykist vera uppi í tíðarandanum um allan heim, at politikkarar bert eru slíkir, sum hugsa um egið gagn og gera sær dælt av fólksins ognum.

Men eg eri sannførdur um, at okkara skipan og okkara fólkaræði verður at liva, styrkjast og aftur at rísa í metum samstundis sum fatanin av, at politiskt arbeiði eisini snýr seg um hugsjónir og vilja til at fremja broytingar rætta vegin til frama fyri land og tjóð.

Í løtuni hava vit eina tvíflokkasamgongu og tykjast ikki aðrir møguleikar at vera. Tað er sera týdningarmikið, at hon megnar at virka í samfull fýra ár, og at eisini andstøðan arbeiðir og samarbeiðir hesi fýra ár.

Tá skapa vit okkum álit og virðing innan- sum uttanlands.

# Farloyvi

29. juli 1992 varð við 31-0 atkvøðum samtykt, at Mamy Dahl Sørensen tekur sætið á tingi fyri Vilhelm Johannesen, sum í skrivi bað um farloyvi.

30. juli 1992 varð við 26-0 atkvøðum samtykt, at Sonmer Winther tekur sætið á tingi fyri Jóannes Dalsgaard, sum í skrivi bað um farloyvi.

18. august 1992 varð við 22-0 atkvøðum samtykt, at Manne Næs, Eliesar Arge og Eyðálvur Dimon taka sætið á tingi fyri Sverra Midjord, Óla Breckmann og Jákup Lindenskov, sum í skrivi bóðu um farloyvi.

25. august 1992 varð við 17-0 atkvøðum samtykt, at Agnar Nielsen tekur sætið á tingi fyri Terja Davidsen, sum í skrivi bað um farloyvi.

28. september 1992 varð við 20-0 atkvøðum samtykt, at Jákup Lamhauge, Dan Petersen og Leivur í Buð Laka sætið á tingi fyri Edmund Joensen, Jørgen Thomsen og Niels Paula Danielsen, sum í skrivi bóðu um farloyvi.

19. oktober 1992 varð við 27-0 atkvøðum samtykt, at Eyðálvur Dimon og Jógvan á Lækjuni taka sætið á tingi fyri Jákup Lindenskov og Olaf Olsen, sum í skrivi bóðu um farloyvi.

30. oktober 1992 varð við 23-0 atkvøðum samtykt, at Hanus undir Leitinum tekur sæt 5 á tingi fyri Eyðun Viderø, sum í skrivi bað um farloyvi.

6. november 1992 varð við 22-0 atkvøðum samtykt, at Dan Petersen tekur sætið á tingi fyri Jørgen Thomsen, sum í skrivi bað um farloyvi.

23. november 1992 varð við 23-0 atkvøðum samtykt, at Eyðálvur Dimon tekur sætið á tingi fyri Jákup Lindenskov, sum í skrivi bað um farloyvi.

12. desember 1992 varð við 23-0 atkvøðum samtykt, at Eliesar Arge tekur sætið á tingi fyri Óla Breckmann, sum í skrivi bað um

farloyvi.

29. desember 1992 varð við 23-0 atkvøðum samtykt, at Manne Næs tekur sætið á tingi fyri Mikkjal Sørensen, sum í skrivi bað um farloyvi.

18. januar 1993 varð við 29-0 atkvøðum samtykt, at Eliesar Arge tekur sætið á tingi fyri Óla Breckmann, sum í skrivi bað um farloyvi.

21. januar 1993 varð við 24-0 atkvøðum samtykt, at Jákup Birgir Mohr tekur sætið á tingi fyri Jógvan Adolf Johannesen, sum í skrivi bað um farloyvi.

26. januar 1993 varð við 23-0 atkvøðum samtykt, at Kári Højgaard, Jákup Lamhauge og Sommer Winther taka sætið á tingi fyri Bassa Klein, Jógvan I. Olsen og Atla P. Dam, sum í skrivi bóðu um farloyvi.

4. februar 1993 varð við 21-0 atkvøðum samtykt, at Agnar Nielsen tekur sætið á tingi fyri Terja Davidsen, sum í skrivi bað um farloyvi.

6. februar 1993 varð við 21-0 atkvøðum samtykt, at Mamy Dahl Sørensen tekur sætið á tingi fyri Vilhelm Johannesen, sum í skrivi bað um farloyvi.

9. februar 1993 varð við 25-0 atkvøðum samtykt, at Sommer Winther tekur sætið á tingi fyri Atla P. Dam, sum í skrivi bað um farloyvi.

10. februar 1993 varð við 20-0 atkvøðum samtykt, at Jógvan á Lækjuni tekur sætið á tingi fyri Olat Olsen, sum í skrivi bað um farloyvi.

23. februar 1993 varð við 22-0 atkvøðum samtykt, at Dan Petersen og Manne Næs taka sætið á tingi fyri Jørgen Thomsen og Mikkjal Sørensen, sum í skrivi bóðu um farloyvi.

25. februar 1993 varð við 17-0 atkvøðum samtykt, at Filif Samuelsen, Heðin Mortensen og Ronald Poulsen taka sætið á tingi fyri Lisbeth L. Petersen, Finnbogi Arge og Heiena Dam á Neystabø, sum í skrivi bóðu um farloyvi.

16. mars 1993 varð við 23-0 atkvøðum samtykt, at Eliesar Arge tekur sætið á tingi fyri Birgir Danielsen, sum í skrivi bað um farloyvi.

31. mars 1993 varð við 20-0 atkvøðum samtykt, at Sonmer Winther tekur sætið á tingi fyri Atla P. Dam, sum í skrivi bað um farloyvi.

1. apríl 1993 varð við 24-0 atkvøðum samtykt, at Jóannes Klein tekur sætið á tingi fyri Jørgen Niclasen, sum í skrivi bað um farloyvi.

14. apríl 1993 varð við 22-0 atkvøðum samtykt, at Johannes Ellefsen, Trúgvi Kallsoy, Leivur í Buð og Jákup Birgir Mohr taka sætið á tingi fyri Frank Davidsen, Lassa Klein, Niels Paula Danielsen og Jógvan Adolf Johannessen, sum í skrivi bóðu um farloyvi.

28. apríl 1993 varð við 23-0 atkvøðum samtykt, at Agnar Nielsen og Sonmer Winther, taka sætið á tingi fyri Terja Davidsen og Atla P. Dam, sum í skrivi bóðu um farloyvi.

Í uppskotinum hjá landsstýrinum verður roknað við, at avgjaldstíðarskeiðið skal verða tað sama fyri allar bólkar, og kemur hetta sera illa við hjá føroysku fiskavirkjunum. Tá hesi innkeypa fisk, skulu tey gjalda meirvirðisgjald afturat fiskaprísinum. Um avgjaldstíðarskeiðið verður tveir ella tríggjar mánaðir, merkir hetta, at fiskavirkini, ið skulu hava meirvirðisgjaldið endurgoldið, tá uppgjørt verður, skulu leggja peningin út í upp til tveir ella tríggjar mánaðir.

Hetta kemur at tyngja gjaldførið hjá fiskavirkjunum heilt munandi. Skattanevndin hevur kunnað seg um, hvussu hesin spurningurin er greiddur í grannalondunum. Í t.d. Íslandi er avgjaldstíðarskeiðið hjá fiskavirkjum øðrvísi enn avgjaldstíðarskeiðið annars. Tað fevnir einans um eina viku.

Viðvíkjandi endurrindanini av innflutningsgjaldi, ið er goldið fyri vørur, sum eru innfluttar áðrenn 1. januar 1993, men ikki seldar brúkarunum áðrenn árslok, er at siga, at handilsvinnan var sera ónøgd við, at hetta endurgjald bert er 80% .

Roknað verður eisini við, at hetta førir til, at fyritøkur royna at selja út av goymslunum í seinasta enda av árinum uttan at keypa nýggjar vørur inn. Hetta

verður sera óheppið fyri fyritøkurnar og brúkararnar og ikki minst óheppið fyri gjaldføri landskassans.

Uppskotna skipanin við at endurgjalda 80% heldur enn 100% er til fyrimuns fyri tær fyritøkur, ið selja skjótt umsetingarligar vørur, og somuleiðis verður hetta ein fyrimunur fyri nýggjar fyritøkur. Hinvegin verða gamlar fyritøkur og serliga tær, ið selja seint umsetiligar vørur, fyri vanbýti.

Skattanevndin metir, at nóg tungt er fyri fyritøkur, at tær ikki fáa innflutningsgjaldið aftur fyri bygningar og framleiðslutól. Skattanevndin mælir tí til, at endurgoldin verða 100% av øllum vørum á goymslu 31. december 1992, eisini teimum, ið eru innfluttar áðrenn 1. januar 1992.

Landsstýrið ásetir í kunngerð nærri reglur um, hvussu hetta endurgjald verður skipað.

Skattanevndin heldur, at hetta kann samskipast við vanliga vøruteljing, sum verður gjørd á øllum fyritøkum á hvørjum ári, har roknað verður við nettovirði. Hetta virðið verður góðkent av grannskoðara og nýtt sum skattligt virði. Tílík uppteljing kann eisini verða gjørd 31. december 1992. Teljast kann t.d. upp í 5 vørubólkar, býttir út eftir núgaldandi innflutningssatsum.

1. Innfluttar vørur við 33% innflutningsgjaldi
2. Innfluttar vørur við 10% innflutningsgjaldi
3. Innfluttar vørur við 6% innflutningsgjaldi
4. Innfluttar vørur við 0% innflutningsgjaldi
5. Føroyskar vørur.

Roknast skulu so ávísir faktorar til ávísu vørubólkarnar. So verður endurgjaldið eitt ávíst prosent av vørum í vørubólki 1, eitt annað ávíst endurgjaldsprosent í vørubólki 2, eitt triðja í vørubólki 3 og einki fyri vørubólk 4 og 5.

Undir hoyringunum í skattanevndini gjørdu umboðini fyri Rithøvundafelagið, Felagið fyri føroyskum Bókaforløgum og Bókhandlarafelagið vart við, at flestu lond í Europa antin einki meirvirðisgjald hava á bókum ella bert eitt sera lágt gjald í mun til meirvirðisgjaldið annars.

Burtursæð frá Danmark, ið enn hevur eitt meirvirðisgjald á bókum upp á 25%, er tað næsthægsta meirvirðisgjaldið á bókum í EF-londunum 7%. Í fleiri londum er tað sum nevnt 0%.

Í norðurlondum eru meirvirðisgjaldssatsirnir á bókum hesir:

| | | |
|---|---|---|
| Finland ..... | 22,0% | |
| Noreg ..... | 0,0% | |
| Svøríki ..... | 25,0% | |
| Ísland ..... | 24,5% | ikki íslendskt mál |
| Ísland ..... | 0,0% | íslendskt mál |

Feløgini løgdu annars dent á, at hetta er ein spurningur um tjóðskap og mentan, og vístu á, at føroyski bókamarknaðurin er sera avmarkaður og tí eisini viðbrekin. Hildið varð, at ein príshækking upp á 20% lættliga kann sláa beinini undan føroyskari bókaútgávu.

Tá talan er um tað fíggjarliga sjónarmiðið, varð fört fram, at nógvar bøkur verða keyptar av almennum stovnum - skúlum og bókasøvnum - og at hesir, saman við landsrikna forlagnum fara at bera kostnaðin av meirvirðisgjaldinum.

Niðurstøða teirra er sostatt, at tann almenna nettoinntøkan, ið stendst av at seta meirvirðisgjaldið á bókum til 20%, verður sera lítil.

Undir viðgerðini er skattanevndin gjørd varug við, at meirvirðisgjaldið m.a. fær ta avleiðing, at byggikostnaðurin fyri sethús gerst munandi hægri. Ein hækking í byggikostnaðinum upp á umleið 150.000 kr. hevur verið nevnd.

Kostnaðarstøðið á sethúsabygging í Føroyum í dag er so mikið høgt, at tey flestu hava trupult við at seta føtur undir egið borð. Tey hava trupult við at fáa fígging, og afturgjaldingin er tung.

Tá okkara grannalond hava sett meirvirðisgjaldsskipanir í gildi, hava tey gjørt skiftisreglur galdandi fyri sethúsabygging, soleiðis at partur av meirvirðisgjaldinum hevur verið endurgoldin.

Skattanevndin hevur umrøtt spurningin og heldur, at ein slík skipan hevði verið bæði rætt og rímiligt. Nevndin mælir til, at slík skipan verður gjørt. T.d. kundu sethús, ið verða liðug í 1993, fingið eitt endurgjald upp á 800 kr. /m², men tó í mesta lagi 84.000 kr., sum svarar til 105 m². Endurgjaldið má ikki verða hægri enn tað meirvirðisgjald, ið veruliga er goldið, og sum kann skjalprógvast.

Hetta endurgjald eigur stigvíst at setast úr gildi yvir eitt ávíst áramál.

Eitt slíkt endurgjald kundi verið útgoldið saman við tí endaliga láninum frá Húsalánsgrunninum. Sum er, umsitur Húsalánsgrunnurin øll tey viðurskifti viðvíkjandi húsabygging, har landskassin er við. Umframt sjálv lánini umsitur Húsalánsgrunnurin eisini bjálvingarstuðulin og rentustuðulin til samansparing til sethúsabygging.

Nevndin heldur tí, at Húsalánsgrunnurin saman við síni lánveiting eigur at umsita eina slíka skipan. Nevndin heldur ikki, at hetta verður nøkur kostnaðarmikil umsiting.

Út frá hesum setir ein samd skattanevnd fram soljóðandi:

# I Uppskot

# til

# samtyktar

Landsstýrinum verður álagt at leggja lógaruppskot fyri løgtingið, sum hevur til endamáls at veita teimum, sum byggja sethús tey næstu árini, partvíst endurgjald av meirvirðisgjaldinum.

Umboð fyri Bóndafelag Føroya, Mjólkarvirki Búnaðarmanna, Fóm Ís og Menningarstovuna hava á fundi við skattanevndina og í brævi víst á vansan fyri føroysku mjólkina, um meirvirðisgjald 20% verður lagt oman á núverandi søluprísir.

Teir vístu á, at mjólk úr EF fær niðurgreiðslustuðul umfram annan stuðul frá EF. Hóast hetta, so hevur verandi innflutningsgjaldsskipan og mjólkarstudningur í Føroyum ført til gleðiligu gongdina her heima við nýtslu av føroyskari mjólk.

Í sølubúðum í dag er innflutta "long life" -mjólkin nakað bíligari enn tann føroyska mjólkin. Hóast hetta keypa flestu føroyingar ta føroysku. Teir bóru ótta fyri, at um innflutningsgjaldið verður avtikið á tí innfluttu, samstundis sum meirvirðisgjald verður lagt á ta føroysku, verður munurin so stórur, at søla av føroysku mjólkini so við og við fellur hurtur.

Tí mæltu teir fyri tað fyrsta til at áseta landbúnaðargjald á útlendsku mjólkina, sum verður ásett samsvarandi EF niðurgreiðslustudninginum, umframt eitt fast gjald. Sambært uppskoti teirra kemur innflutta mjólkin við 15% vinningi til sølubúðina at kosta 8,22 kr./ltr. Hesum tekur skattanevndin undir við og mælir landsstýrinum til at hava hetta við í neyðugu broytingunum í tolllógini, sum skulu gerast í samband við meirvirðisgjaldið.

Fyri tað næsta mæla teir til eina afturbering av meirvirðisgjaldinum. Teir mæla til, at meirvirðisgjaldið fram til sølu frá mjólkarvirkinum verður endurgoldið soleiðis, at meirvirðisgjaldið til endaliga brúkaran verður avmarkað til meirvirðisgjald av vinninginum hjá sølubúðunum.

Landbúnaðurin verður ikki bert negativt raktur, men eisini eru góðir eginleikar við meirvirðisgjaldinum. Landbúnaðurin eins og øll vinnan verður við meirvirðisgjaldinum frítikin fyri avgjøld, umframt at vinnan í avgjaldstíðarskeiðinum upp á 3 mánaðir hevur meirvirðisgjald í varðveitslu fyri landskassan. Hetta gevur teimum sjálvsagt nakað av gjaldføri og teir fyrimunir, ið harvið eru.

Um landbúnaðurin av omanfyri nevnda letur 20 oyru/ltr. av prísinum og mjólkarstudningurin verður hækkaður við 80 oyrum/ltr., verður príshækkingin lítil. Um sølubúð tekur 15% í vinningi, hækkar prísurin á føroysku mjólkini úr 8,63 kr./ltr. upp til 8,98 kr./ltr. Tað er ein príshækking, ið er at liva við. Summar sølubúðir taka í dag ongan vinning av føroysku mjólkini, tær kunnu við hesi skipan selja mjólkina fyri 7,80 kr./ltr.

Út frá hesum setir ein samd skattanevnd fram soljóðandi:

## II Uppskot

## til

## samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at leggja fyri løgtingið uppskot um áseting av landbúnaðargjaldi og hækking av mjólkarstudninginum til partvíst endurgjald fyri meirvirðisgjaldið.

Landbúnaðurin í Føroyum hevur í høvuðsheitum tveir vinnuvegir. Fyri tað fyrsta er tað mjólkin og í øðrum lagi er tað seyðurin. Bæði verða hart rakt av meirvirðisgjaldinum.

Tað er ymist, hvussu lutfallið millum hesar framleiðslur er hjá teimum ymisku bólkunum. Summir hava nógv mjólkineyt og lítið av seyði o.s.fr. Sum skipanin er í dag, er nóg mikið av mjólk, so bóndur sleppa ikki at fáa sær fleiri mjólkineyt, og teir, sum ikki hava mjólkineyt, sleppa als ikki at fáa sær tey nú. Tí er ikki rætt bert at stuðla framleiðsluni av mjólk, men eisini eigur at hugsast um føroyska seyðakjøtið, sum í dag er tvær ferðir so dýrt sum tað íslendska. Hetta er grundað á ovurstóra íslendska útflutningsstuðulin.

Lágmarksprísurin fyri føroyskt seyðakjøt er í dag 54 kr./kg. Um vit t.d. góvu stuðul upp á 5 kr./kg, og bóndin av sínum fyrimunum av meirvirðisgjaldinum lat 4 kr./kg, kom lágmarksprísurin niður á 45 kr./kg. Eitt meirvirðisgjald upp á 20% omaná hevði givið brúkaranum ein prís upp á 54 kr./kg.

Møguleikan at stuðla føroyskum seyðakjøti hava vit sambært handilsavtaluni millum EF og Føroyar.

Samsvarandi hesum setir ein samd nevnd fram soljóðandi:

## III Uppskot

## til

## samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at leggja uppskot fyri løgtingið um eina stuðulsskipan fyri føroyskt seyðakjøt.

Í viðmerkingunum til § 14 í uppskotinum sigur landsstýrið, at miðað verður ímóti, at meirvirðisgjaldið og tey punktgjøld, ið skulu galda framyvir, fara at geva landskassanum somu inntøku, sum galdandi avgjaldsskipan.

Víðari verður sagt, at um meirvirðisgjaldsskipanin hevði verið í gildi í 1990, hevði hendan saman við tolli og punktgjøldum givið landsskassanum eina inn-

tøku upp á 688 milliónir krónur. Til sammetingar verður víst á, at veruliga inntøkan av innflutningsgjøldum og tolli í 1990, var 675 milliónir krónur. Eftir hesum gevur meirvirðisgjaldið meira. Men frávikið er einans 13 milliónir.

Skattanevndin loyvir sær at ivast í, um henda meting fer at halda, og byggir sín iva á tann veruleika, at landskassans inntøkur, stavandi frá innflutningsgjøldum í 1991, gjørdust minni enn í 1990, og at fyribilstøl fyri 1992 geva eina heilt greiða ábending um, at aftur í ár gerst hesin parturin av landskassans inntøkum minni enn í fjør.

Skattanevndin heldur, at landsstýrið beinanvegin eigur at seta nágreiniligar kanningar í verk soleiðis, at greiða fæst á, hvørjar avleiðingar uppskotna prosentið til meirvirðisgjald fær fyri landskassan í 1993 og framyvir.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Eyðun Viderø og Jørgen Niclasen) ásannar, at í handilsavtaluni millum EF og Føroyar, hava vit bundið okkum til at seta eina meirvirðisgjaldsskipan í gildi frá 1. januar 1993, og mælir meirilutin tí til, at uppskot landsstýrisins verður samtykt við ávísum broytingum.

Sum nevnt frammanfyri er avgerð tikin um, at Føroya Tollstova, Líkningarráð Føroya og MVG-umsitingin skulu leggjast saman til ein stovn, og hevur landsstýrið samtykt, at stovnurin hereftir skal eita "Toll- og Skattstova Føroya". Sum eina avleiðing av hesum mælir meirilutin til, at navnið "Føroya Tollstova" í lógaruppskotinum verður broytt til "Toll- og Skattstova Føroya". Meirilutin setir fram broytingaruppskot samsvarandi hesum, og tað er broytingaruppskot 1).

Á fundi við umboð fyri kommununar kom fram, at tað er neyðugt at taka ávísar orðingar úr lógini, við tí fyri eyga, at fáa greiðari reglur í sambandi við afturrindan av meirvirðisgjaldi til kommununar. Hesar reglur, ið gera umsitingina einfaldari, verða ásettar í kunngerð. Meirilutin tekur undir við, at henda broyting verður gjørd og setir fram broytingaruppskot um hetta. Talan er um broytingaruppskot 2).

Við broytingaruppskoti 4) mælir meirilutin til at broyta § 10, 1. og 2. stk. Endamálið við hesum er eisini at gera umsitingina einfaldari. Í hesum førinum verður tað gjørt við at javnseta øll akfør. Í útrokningargrundarlagnum hjá landsstýrinum vórðu tveir útrokningarhættir nýttir. Við broytingini verða allir bilar roknaðir eins, men hetta gevur kortini sama krónutal, sum reglan í landsstýrisuppskotinum hevði givið.

Vísandi til tað, sum vinnulívsumboðini førdu fram undir hoyringini í skattanevndini, mælir meirilutin eisini til, at avgjaldstíðarskeiðini verða broytt frá tveimum til tríggjar mánaðar. Somuleiðis verður mælt til, at virkir, ið javnan hava negativa avgjaldsupphædd, kunnu fáa loyvi frá Toll- og Skattstovu Føroya at avrokna eina ferð um vikuna. Broytingaruppskot 5) fevnir um hesar broytingar.

Við broytingaruppskoti 9) mælir meirilutin til, at afturrindanin av innflutningsgjøldum, ið eru goldin fyri vørur, sum eru keyptar inn, men ikki seldar áðrenn 1. januar 1993, verður 100% í staðin fyri 80%, og at endurrindanin eisini skal fevna um vørur, ið eru keyptar inn áðrenn 1992. Annars vísir meirilutin til tann almenna partin av álitinum, har eitt dømi er um, hvussu henda endurrindan kann fara fram.

Undir viðgerðini í nevndini er komið fram, at í lógaruppskotinum er einki, sum forðar fyri, at virkir og stovnar, ið ætla at gera íløgur í 1993, kunnu bíleggja og gjalda fyri latingina í 1992 og harvið sleppa undan at rinda meirvirðisgjaldið, hóast latingin ikki verður aktuell fyrr enn í 1993. Fyri at forða fyri slíkari misnýtslu av skipanini, mælir meirilutin til nýggja lógargrein, sum er broytingaruppskot 10).

Annars mælir meirilutin til fimm aðrar broytingar. Hesar eru 3), 6), 7), 8) og 11). Talan er um tekniskar broytingar. Í stóran mun stava hesar frá umsitingarligu samanleggingini, sum er umrødd í álitinum.

Samsvarandi hesum setir meirilutin fram soljóðandi:

## I Broytingaruppskot

1) Har í lógini orðið "Tollvaldið" ella onnur bending av hesum orði er nýtt verður í staðin sett:
"Toll- og Skattstova Føroya".

2) Í § 3, 1. stk., litra d, ganga út 2. og 3. punktum og í 2. stk. gongur út: "ið verða keyptar í kapping við kommunalt virksemi."

3) Í § 7, 3. stk. verður orðið "ov" broytt til: "og".

4) Í § 10, 1. stk. verður orðingin "við loyvdari totalvekt ikki yvir 4 tons" strikað. § 10, 2. stk. fær hesa orðing: "Fyri virki, ið leiga út motorakfør, og fyri koyriskúlar verður reglan sambært 1. stk. í hesi grein galdandi."
Í § 10, 4. stk. verður orðingin: "tá ogning fer fram" broytt til: "tá ognað verður".

1) Det i loven anvendte udtryk "Toldvæsenet" ændres til:
"Toll- og Skattstova Føroya".

2) I § 3, stk. 1, litra d udgår 2. og 3. punktum, samt i stk. 2 udgår: "der købes i konkurrence med kommunale virksomheder."

3) Uændret.

4) I § 10, stk. 1 udgår formuleringen "med tilladt totalvægt ikke over 4 tons". I § 10, formuleres stk. 2 således: "Udlejningsvirksomheder og køreskoler omfattes af regelen i stk. 1."

5) Í § 20, 2. stk. verður orðingin broytt til: "Avgjaldstíðarskeiðini eru 4 um árið. Januar, februar og mars, apríl, mai og juni, juli, august og september og oktober, november og desember."

Í § 20 verður sett sum nýtt stk. 3:

"Virkir, ið javnan hava negativa avgjaldsupphædd, kunnu fáa loyvi at avrokna eina ferð um vikuna. Avgjaldstíðarskeiðið kann bert broytast soleiðis, at hetta fer fram í byrjanini av avgjaldstíðarskeiðinum sambært 2. stk. Søkjast skal um hetta loyvi ein mánað frammanundan. Verður loyvið játtað virkinum, skal hetta verða galdandi fyri minst 2 ár."

6) § 31, 3. stk. gongur út.

7) § 37, 2. stk. gongur út.

8) § 38, 2. stk. verður orðað:

"Hagstovan verður ikki mett at vera viðkomandi sambært 1. stk."

9) Í § 40, 1. stk. verður "80%" broytt til "100% jbr. stk. 3" og "í 1992" verður strikað.

Í § 40, 2. stk. verður "í 5 pørtum" broytt til : "í 3 pørtum".

10) Sum nýggj § 41 verður sett:

"Hóast goldið verður fyri latingar av avgjaldsskyldugum vørum og tænastum áðrenn 1. januar 1993, eru latingar, ið fara fram aftan á 31. desember 1992 avgjaldsskyldugar sambært § 1 í hesi lóg." §§ 41 og 42 verða hereftir §§ 42 og 43.

11) Í § 43 verður strikað orðingin:

" - burtursæð frá kunngerð nr. 67

5) I § 20, stk. 2 affattes: "Afgiftsperioderne er 4 pr. år: Januar, februar og marts, april, maj og juni, juli, august og september og oktober, november og december."

I § 20 indsættes som nyt stk. 3:

"Virksomheder, der jævnligt har negativ afgiftstilsvar kan få tilladelse til at afregne en gang om ugen. Afgiftsperioden kan kun ændres således, at dette sker i begyndelsen af afregningsperioden i henhold til stk. 2. Der skal søges om denne tilladelse en måned i forvejen. En bevilget tilladelse gælder for en periode af mindst 2 år."

6) § 31, stk. 3 udgår.

7) § 37, stk. 2 udgår.

8) § 38, stk. 2 formuleres således:

"Som uvedkommende i henhold til stk. 1 regnes Hagstovan".

9) I § 40, stk. 1 ændres "80%" til : "100%" og "i 1992" udgår.

10) Som ny § 41 indsættes:

"Uanset betaling for afgiftspligtige varer og tjenester, der sker inden 1. januar 1993, er leverancer, der sker efter 31. december 1992 afgiftspligtige i medfør af § 1 i denne lov." §§ 41 og 42 bliver herefter §§ 42 og 43.

11) I § 43 udgår ordene: "- med undtagelse af bekendtgørelse nr. 67 af

frá 26. juni 1991 um veiting av undantaksloyvi at fáa tollskyldugar vørur útflýggjaðar, áðrenn gjaldið er goldið -" og aftan á orðið "kunngerðir" verður sett ", ".

26. juni 1991 om meddelelse af undtagelsesret til at udlevere toldpligtige varer, før afgifter er betalt" og efter ordet "bekendtgørelser" indsættes",".

Viðvíkjandi meirvirðisgjaldi av bókum hevur ein partur av meirilutanum (Vilhelm Johannesen) tikið serstøðu. Hann mælir til, at bøkur verða undantiknar meirvirðisgjaldi, og setir fram broytingaruppskot um hetta (broytingaruppskot II). Um hetta verður samtykt, verður § 12, stk. 1, litra i strikað.

Samsvarandi omanfyristandandi viðmerkingum setir minnilutin (Vilhelm Johannesen) fram soljóðandi:

## II Broytingaruppskot

1) Í § 12, 1. stk., litra h verður aftan á "tíðindabløðum" sett: "tíðarritum og bókum". § 12, stk. 1, litra i verður strikað.
2) Í § 26, 5. stk. verður aftan á "Tíðindablað" sett: "útlendsk tíðarrit og bøkur", og 2. punktum skal strikast.

1) I § 12, stk. 1, litra h indsættes efter "aviser": "tidsskrifter og bøger". § 12, stk. 1, litra i udgår.
2) I § 26, stk. 5 indsættes efter "Aviser": "udenlandske tidsskrifter og bøger", og 2. punktum udgår.

Ein minniluti (Finnbogi Arge) førir fram:

Orsøkin til, at føroyingar frá 1. januar 1993 mugu fara undir at rinda meirvirðisgjald upp á vørur og tænastur við teimum undantøkum, sum løgtingsuppskotið loyvir, er tann, at landsstýrissamgongan millum Javnaðar- og Fólkaflokkin tann 21. juni 1991 gjørdi eina handilsavtalu við EF. Henda avtala var seinni staðfest av meirilutanum á Føroya Løgtingi.

Sambandsflokkurin tók ikki undir við handilsavtaluni. Floksins umboð í marknaðarnevndini førdi m.a. fram, at fleiri hundrað arbeiðspláss fóru at hvørva, at tann føroyski útflutningurin misti Danmark sum heimamarknað, at avtalan forðaði okkum at keypa og virka rávørur úr triðjalondum og selja hesar á EF-marknaðinum, og at avtalan fevndi um kvotur og loft, sum kunnu at forða menningini av okkara samfelag.

Sambandsflokkurin vísti eisini á, at Ísland sum EFTA-limur hevur fingið betri handilssømdir enn Føroyar og setti tí soljóðandi uppskot til samtyktar:

"Landsstýrinum verður álagt at taka upp nýggjar samráðingar við EF fyri:

1. At bøta um verandi uppskot til handilsavtalu, nú EF og EFTA hava gjørt ein sáttamála.
2. At fyrireika eitt samstarv við EF, sum er tættari enn ein handilsavtala.

Hetta uppskot varð felt, hóast sambandsflokkurin ávaraði um, at prísurin fyri handilsavtaluna var ov høgur.

Hvør var so prísurin? Ein partur av prísinum var, at føroyingar bundu seg frá 1. januar í 1992 til at innføra GATT-tollin til frama fyri vørur við EF-uppruna.

Hetta er gjøgnumført, men hóast skattanevndin framdi 170 broytingar í uppskoti landsstýrisins, er tað tíverri ein sannroynd, at GATT-tollurin hevur elvt til stóra misnøgd í handils- og vinnulívinum.

Ein annar - og týdningarmiklari - partur av prísinum fyri handilsavtaluna var, at vit frá 1. januar 1993 skulu taka núverandi skipan við innflutnings- og framleiðslugjøldum av og í staðin fara yvir til eitt meirvirðisgjald, sum ikki ger mun á innfluttum vørum og vørum, sum eru framleiddar her heima.

Samgongumeirilutin í skattanevndini førir fram, at tað er neyðugt at innføra meirvirðisgjaldsskipanina orsakað av handilsavtaluni við EF. Hetta er eisini rætt, men teir gloyma at siga, at teir sjálvir hava valt hesa handilsavtalu fram um aðrar møguleikar.

Handilsavtalan er einki annað enn tað úrsliti, sum sitandi løgmaður megnaði at fáa burturúr tingingunum við EF. Hetta úrslitið var ikki nóg gott, og tí er handilsavtalan við EF heldur ikki nóg góð.

Sambandsflokkurin hevði kunnað livað við einari broyttari meirvirðisgjaldsskipan, um tað føroyska samfelagið hevði fingið meira burturúr handilsavtaluni. Meirvirðisgjaldsskipanin er eitt gott kort at handla við, men vit hava spælt hetta kortið av hondini, uttan at vit hava fingið nóg mikið afturfyri.

Flokkurin kann ikki góðtaka, at stórt sæð øll føroysk framleiðsla til heimamarknaðin verður ofrað, uttan at høvuðsvinnan afturfyri fær best møguligar marknaðarsømdir, og í minsta lagi somu sømdir, sum Ísland hevur fingið.

Nú er sera ivasamt, um tey arbeiðspláss, sum fara fyri skeyti í heimaídnaðinum, verða vunnin aftur í útflutningsliðinum, av tí at tilgongdin av fiski er minkað so nógv í seinastuni. Vit eiga at seta eitt stórt spurnartekin við tær 50 milliónirnar, sum sagt hevur verið, at handilsavtalan gevur høvuðsvinnuni.

Ein av politisku standardloysnunum hjá Javnaðarflokkinum er virðisøking av fiskaframleiðsluni. Títt og ofta siga teir, at vit skulu meirviðgera rávøruna á flakavirkjunum og á henda hátt økja um útflutningsvirðið, men samstundis gera teir eina handilsavtalu við EF, sum spennir bein fyri útflutninginum av viðgjørdum vørum úr Føroyum.

Handilsavtalan hevur tíverri við sær, at Ísland og Noreg fáa ein fyrimun framum Føroyar at útflyta viðgjørdar vørur til EF-marknaðin. Hesi lond kunnu útflyta óavmarkaðar nøgdir av kap. 16 vørum, meðan vit eru læstir fastir við eini kvotu upp á 2000 tons.

Meðan Ísland og Noreg kunnu útflyta allan saltfisk tollfrítt, hava Føroyar nøkur loft á saltfiski og saltfløkum. Ísland hevur ongan toll á rækjum, meðan vit hava 3% av heilum og 4% á pilkaðum rækjum.

At fiskivinnan her heima ikki skal rinda innflutnings- og meirvirðisgjald, er eitt stig á leiðini, men ikki nóg mikið at fáa afturfyri tann prísin, sum tað føroyska samfelagið skal gjalda. Kravið má í minsta lagi verða, at vit fáa tollfrælsi fyri allar føroyskar fiskavørur og munandi betri sømdir fyri innkeyptan fisk úr triðjalondum.

Tá handilsavtalan varð veruleiki, legði løgmaður stóran dent á tann sokallaða EFTA-klausulin, sum skuldi tryggja, at føroyingar ikki komu verri fyri enn EFTA-londini á EF-marknaðinum. Vit hava í dag verri sømdir enn ávís EFTA lond, men kortini bendir einki á, at løgmaður ætlar at gera nakað burturúr hesum klausuli, sum sostatt má metast at vera týdningarleysur. Tann stóri spurningur er so, um útviklingsklausulurin eisini fer at roynast svikaligur.

Hóast minnilutin undir verandi treytum ikki kann taka undir við meirvirðisgjaldinum hevur minnilutin roynt at ávirka arbeiðið í skattanevndini, sum hevur tikið stig til nakrar positivar broytingar:

a) Avgjaldstíðarskeiðið verður broytt frá tveimum til tríggjar mánaðir.
b) Virkir við støðugt negativari avgjaldsupphædd, t.v.s. virkir í útflutningsvinnuni fáa inngjaldið endurgoldið hvørja viku.
c) Innflutningsgjaldið, ið er goldið fyri vørur á goymslu, verður í samband við uppgerðina við árslok endurgoldið 100% (og ikki við 80%, sum landsstýrið upprunaliga ætlaði).
d) Bøkur fáa eftir øllum at døma ikki meirvirðisgjald. (Løgtingið kann tó taka eina aðra avgerð viðvikjandi bókum, av tí at umboð fólkafloksins í skattanevndini mælir til at leggja gjald á.)
e) Serskipanir verða galdandi fyri mjólk og seyðakjøt.
f) Byggivinnan fær eina tillagingarskipan.

Best hevði verið, um vit høvdu fleiri tillagingarskipanir, eitt nú fyri bakaravinnuna, men hesi sjónarmið hava ikki vunnið frama í skattanevndini.

Samanumtikið kann sigast, at sjálv meirvirðisgjaldsskipanin aftan á broytingarnar hjá skattanevndini er betri enn tann skipanin, sum landsstýrið skeyt upp. Men skipanin fer at hava við sær, at "svart arbeiði" verður gjørt í størri mun enn higartil. Tað er sera óheppið, at skipanin verður tikin í nýtslu samstundis við, at

samfelagið búskaparliga ekur á knøunum, bæði tí at virkini ikki hava ráð til at leggja um, og tí at forbrúkarin ikki megnar at lyfta fleiri byrðar.

Stór óvissa er um, hvussu nógv skipanin fer at geva landskassanum. Útrokningar, sum eru grundaðar á 1990-tøl, vísa, at talan verður um 13 milliónir. Skattanevndin ivast í hesum tølum og mælir landsstýrinum til at gera nýggjar kanningar. Minnilutin er sannførdur um, at endin verður tann, at vit fáa ein prosentsats, sum verður hægri enn tey 20 prosentini, sum landsstýrið hevur fráboðað. Tað er jú øllum greitt, at sitandi samgonga hevur lættari við at semjast um at leggja skattir og gjøld á føroyingar enn t.d. at skera minni týðandi íløgur á fíggjarlógini burtur. Eitt amboð sum meirvirðisgjaldið er ikki heilt vandaleyst í hondunum hjá einum optimistiskum landsstýrismanni í fíggjarmálum.

Tað var tann tíð, tá Javnaðarflokkurin partvíst arbeiddi fyri tann minni menta og m.a. var við til at geva føroyingum ellisrentuna. Í hesari samgonguni hevur hann økt um skattabyrðarnar hjá øllum borgarunum, eisini tí minni menta. Ein tann keðiligasta avleiðingin av meirvirðisgjaldinum er, at pensiónistar, sum frammanundan hava lítið at liva av, verða lutvíst harðari raktir enn onnur, m.a. orsakað av hækkaða útvarps- og sjónvarpsgjaldinum. Tí átti ein serskipan fyri pensiónistar at verið umhugsað.

Vísandi til viðmerkingar omanfyri setir minnilutin (Finnbogi Arge) fram soljóðandi:

**IV Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at taka upp samráðingar við EF um nýggjan sáttmála, nú greitt er vorðið, at ávís EFTA-lond hava fingið betri marknaðarsømdir enn føroyingar.

**V Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at fyrireika eitt samstarv við EF, sum:

a) Gevur føroyskum útflutningi munandi betri møguleikar á EF-marknaðinum.
b) Gevur føroyskum borgarum somu lestrar- og vinnumøguleikar, sum EF-borgarar í dag hava í øllum EF-londum.

Hetta seinna uppskotið skal setast í samband við vaksandi arbeiðsloysi her á landi og teir skerdu møguleikamar hjá tí føroyska ungdóminum at finna sær eitt framtíðaryrki á føroyskum klettum.

## III Broytingaruppskot

## til

## uppskot landsstýrisins.

| | |
|---|---|
| § 14 verður orðað soleiðis: | § 14 affattes således: |
| "Avgjaldið er 18% av avgjaldsskyldugu søluni." | "Afgiften udgør 18% af den afgiftspligtige omsætning." |

Ein annar minniluti (Lasse Klein) hevur hesar viðmerkingar:

Orsøkin til, at meirvirðisgjaldið fær hesa viðgerð, er orsakað av handilssáttmálanum við EF, frammanundan eru tolllógirnar avgreiddar, eisini sum ein partur av handilssáttmálanum.

Soleiðis sum viðurskiftini vóru og eru kunngjørd fyri okkum og Føroya fólki, er Sjálvstýrisflokkurin ræddur fyri, at EF-avtalan er og verður ein vanlukka fyri føroyska samfelagið, og at tað er okkara uppgáva sum andstøða at vísa á vandamálini í avtaluni. Hetta gjørdu vit, tá handilssáttmálin var til viðgerðar, hetta gjørdu vit eisini, tá broytingarnar í tollógunum vóru til viðgerðar, og hetta gera vit aftur, nú meirvirðisgjaldið er til viðgerðar.

Okkara uppgáva er ikki at mæla um ómegd og máttloysi ella smíða søgu, ið goymir ráka av ábyrgdarloysi o.ø., men heldur ikki at krógva veruleikan í onkrum skýmaskoti, sum gjørt hevur verið í spurninginum um handilssáttmálan við Europeiska Búskaparliga Felagsskapin øðrumegin og Føroya Landsstýri hinumegin.

Vit eiga at gera okkum púra greitt, at við at samtykkja løgtingslóg um meirvirðisgjald, undirskriva vit eisini samstundis "deyðadóm" yvir partar av handilsfyritøkum, sølubúðum, íðnaðarfyritøkum og øðrum, sum yvirhøvur ongar møguleikar hava fyri at umsita treytirnar í lógini fyri meirvirðisgjald.

Minnilutin (Lasse Klein) vísir á hoyringarnar, sum skattanevndin hevur havt við fyritøkur og áhugabólkar, har tað klárt og týðiliga er komið til sjóndar, at fleiri longu nú hava boðað frá, at tað fær "katastrofalar" fylgjur fyri vinnugreinar teirra.

Tann eini bólkurin gjørdi greitt, at teir roknaðu við at missa 30-40% av arbeiðsplássunum hjá teirra limum í 1993. Hetta svarar til 400 limir, ið allir hava upp til fleiri fólk í arbeiði. Eisini eru fráboðanir komnar um "einmans fyritøkur", sum heilt einfalt velja at geva skarvin yvir longu við árslok 1992.

Sama hendi í Danmark, tá *Momsurin* kom í gildi har.

Høvuðsmunurin millum MVG og tollin er, at MVG verður umsitið av fyritøkum heldur enn av almennum myndugleikum.Umsitingin kemur at tyngja arbeiðsbyrðarnar hjá so at siga øllum privatum fyritøkum her á landi. Einkultmansfyritøkurnar verða uttan iva tær, sum verða harðast raktar. Økta arbeiðsbyrðan fer at hava tað við sær, at fleiri fara at gevast.

Í londunum kring okkum, sum hava meirvirðisgjald, er "svart arbeiði" dagligur kostur, og uttan iva fer "svart arbeiði" at økjast rættiliga nógv eftir, at meirvirðisgjaldið er samtykt, hetta førir við sær stórar trupulleikar, ikki bert at landskassin fær minni inn av peningi, men eisini at størri fyritøkur innan t.d. byggivirksemi og umvælingar annars koma at kappast við arbeiðsleysar handverkarar, ið kunnu gera arbeiðið bíligari *uttan* MVG.

Ídnaðurin, ið framleiðir til heimamarknaðin kemur at standa eftir við sviðið soð, tí nú skulu teir til at kappast við útlendskar fyritøkur, ið ikki skulu gjalda toll av teirra vørum, meðan tær føroysku fyritøkurnar náttúrliga hava ein hægri framleiðslukostnað orsakað av el- og oljuprísum, íløgukostnaðinum o.s.fr. Kappast ímóti EF-fyritøkum, ið hava verið á internationala marknaðinum í fleiri ár, og sum hava brúkt fleiri milliónir fyri at gera vørur sínar kendar.

Soleiðis, sum støðan í dag er í samfelagið okkara, er tað valla nøkur fyritøka, ið er før fyri at taka kappingina upp á internationala marknaðinum uttan mun til, um talan er um stóra ella meðalstóra føroyska fyritøku.

Støðan hjá allari føroyskari vinnu er ørkymlandi og liggur á gravarbakkanum um stutta tíð, um ikki kósin í handilssáttmálanum við felagsmarknaðin verður broytt.

Vit eru í ferð við at gerast eitt EF-land uttan fyri EF undir nógv verri treytum, enn limalondini hava, undir nógv verri treytum enn tey lond, sum hava sáttmála við EF.

Orsøkin er heilt einfalt hon, at føroyska samfelagið hevur fingið ein handilssáttmála, sum á ongan hátt hóskar til føroyska samfelagið og føroyska bygnaðin.

Vit hava bundið okkum til eina toll- og avgjaldsskipan, ið er umfatandi og fløkt og krevur stórt umsitingarligt arbeiði. Vit hava bundið okkum til eina meirvirðisgjaldsskipan, ið krevur uppaftur meiri umsiting. Hetta er eingin trupulleiki hjá stórum virkjum, verður sagt av samgonguni, júst somu orð, ið tænastufólkini í EF brúka. Bert gloyma teir, at vit eiga eingi stór virkir í Føroyum.

Allur vinnulívspolitikkurin hjá EF hevur tíl endamáls at fáa stórar altjóða fyritøkur, meðan tey smærru virkini í EF sleppa at sigla sín egna sjógv, til tey bukka undir fyri tí bureaukratiska trýstinum í hesum tænastumannaveldinum.

Hetta samfelagsmynstrið hevur samgongan bundið Føroya fólk og føroyska vinnulívið at liva og virka undir.

"Vit skulu kappast á jøvnum føti sum kappingarneytar okkara fyri eystan", sigur samgongan. Slíkt kann bert sigast av fólki, ið lítið og einki veit um umstøðurnar, føroyska vinnulívið skal virka undir: 3-faldaður elprísur, oljuavgjøld, farmagjald av øllum tilfari, vit senda á marknaðin. Afturat hesum kemur vánaliga umdømið, ið Føroyar hava fingið orsakað av vánaligari politiskari leiðslu síðani 1989.

Minnilutin tekur undir ongum umstøðum undir við meirvirðisgjaldinum, men drúgvar royndir hava verið gjørdar undir nevndararbeiðinum at gera broytingar í uppskotna uppskotinum t.d.

1) ein serstøk skipan fyri mjólk og seyðakjøt,
2) tillagingarskipan fyri byggivinnuna,
3) at innflutningsgjaldið verður broytt úr 80% upp í 100%,
4) at avgjaldstíðarskeiðið verður broytt frá tveimum mánaðum til tríggjar mánaðir.
5) at bøkur sleppa undan meirvirðisgjaldinum.

Í hesum sambandi kann nevnast, at inngjaldið til útflutningsvinnuna verður endurgoldið hvørja viku.

Minnilutin (Lasse Klein) vísir á, at Sjálvstýrisflokkurin mælti harðliga ímóti at samtykkja handilssáttmálan við EF, tí hóast avtalan við EF á prenti tóktist betri enn tann avtalan, sum vit høvdu frammanundan, so mugu vit kortini viðganga, at allar tær treytir, sum fylgja við avtaluni: Toll- og avgjaldsskipanin og meirvirðisgjaldið - altíð koma at standa sum eitt illa fyrireikað arbeiði frá føroyskari politiskari síðu, sum ger, at eingir fyrimunir eru eftir, sum tala fyri, at avtalan við EF yvirhøvur átti at fáa gildi fyri Føroyar soleiðis, sum hon í dag fyriliggur.

Í samráðingunum við EF er ikki gingið eftir handilsligum sjónarmiðum, eingin handilslig javnvág er í samhandlinum við EF, sum støðan er í dag.

Neyðugt er, at viðurskiftini við EF verða tikin upp til nýggja viðgerð, og tí verður sett fram soljóðandi:

**VI Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Landsstýrinum verður álagt at taka upp nýggjar samráðingar við Europeiska Búskaparliga Felagsskapin og at leggja úrslitið av samráðingunum fyri Føroya Løgting, áðrenn støða yvirhøvur verður tikin til nýggja uppskotið.

Minnilutin (Lasse Klein) ger vart við, at sambært § 41, er ætlanin, at lógin skal fáa gildi frá 1. januar 1993, t.v.s. um eitt hálvt ár, hetta heldur minnilutin vera ov

stutta tíð. Í Íslandi varð lógin um meirvirðisgjaldið ikki sett í gildi fyrr enn eitt ár og sjey mánaðir aftaná, at lógin varð samtykt í íslendska altinginum. Orsøkin var hon, at vinnan og samfelagið skuldu hava stundir at fyrireika gongdina frá gomlu til nýggju skipanina. Um so er, at omanfyristandandi uppskot til samtyktar ikki verður samtykt, setir minnilutin samsvarandi omanfyristandandi viðmerkingum fram soljóðandi:

## III Broytingaruppskot

## til

## uppskot landsstýrisins

| | |
|---|---|
| Í § 41, 1. stk., verður "1. januar 1993" broytt til: "1. januar 1994". | I § 41, stk. 1 ændres "1. januar 1993" til: "1. januar 1994". |

## Broytingaruppskot

## til

*løgtingsmál nr. 1/1992: Løgtingslóg um meirvirðisgjald.*

**Viðmerkingar til broytingarnar:**

**Til § 12, 1. stk., j):**
Soleiðis, sum uppskotið um meirvirðisgjald er samtykt við 2. viðgerð, er skipanin millum skip og virkir soleiðis, at tá skip selir til virkið, skulu 20% í meirvirðisgjaldi leggjast oman á prísin. Virkini, sum skulu gjalda hetta, fáa peningin aftur eftir einari viku frá landskassanum. Landskassin fær tó ikki peningin aftur frá skipunum fyrr enn 3 mánaðir seinni.

Ógrundað er at hava tílíka skipan, tí her er bert talan um peningaflutning, sum eingin fær nakað av. Soleiðis, sum gjaldførið í samfelagnum er, mælir skattanevndin til at gera eina broyting soleiðis, at meirvirðisgjaldið ikki verður kravt upp, tá ið skip selir fiskin til onnur enn heilsølur og smásølur, t.v.s. at talan er um nullsats við sølu av fiski.

Hetta merkir so, at skipini annars verða í meirvirðisgjaldsskipanini og verða skrásett og skulu avrokna, og at tey kunnu draga alt inngangandi avgjald frá í meirvirðisgjaldsroknskapinum, samstundis sum tey ikki krevja upp meirvirðisgjald við sølu av fiski.

**Til § 20, nýtt 3. stk.:**
Broytingin er her orðingin í § 20, 3. stk., og talan er um eina máltekniska broyting. Mett verður, at tað er rættast, at orðingin í hesi grein verður broytt soleiðis, at tað týðiliga kemur fram, at virki, tá ið tey hava fingið loyvi at nýta vikuavrokning, ikki tey næstu tvey árini skulu kunna nýta vanliga avrokningartíðarskeiðið upp á 3 mánaðir.

**Til § 33, 1. og 3. stk.:**
Í § 33, 1. stk. er talan um eina tekniska rætting, í føroyska tekstinum skal orðið "grovum" setast í staðin fyri orðið "stórum".

Í § 33, 3. stk. er eisini talan um eina tekniska rætting soleiðis, at "at sleppa undan at rinda landskassanum avgjald" skal strikast, og í staðin fyri skal setast: "fáa avgjald útgoldið úr landskassanum".

**Til § 38, 2. stk.:**
Talan er um eina villu í danska tekstinum, og villan skal rættast soleiðis, at orðið "ikke" verður sett í tekstin aftan á "regnes". Við hesum verður samsvar millum føroyska og danska tekstin.

**Til § 40, 1., 2 og 4. stk.:**
Broytingin til § 40, 1. stk. er, at virki, ið skulu hava innflutningsgjaldið endurgoldið, skulu hava sent goymsluuppgerð áðrenn 1. februar 1993.

Broytingin til 2. stk. er, at tað klárt kemur fram, at tað er innflutningsgjaldið av bókførda skattliga virðinum á vørugoymsluni, ið er grundarlagið fyri endurrindan.

Í 4. stk. er sett ein regla um, at landsstýrinum verður heimilað við kunngerð at áseta, at vørugoymslan skal gerast upp sambært skattligu reglunum um uppgerð av vørugoymslu, og at uppgerðin skal váttast av løggildum ella skrásettum grannskoðara.

Ein sand skattanevnd setir sostatt fram soljóðandi:

## Broytingaruppskot

| | |
|---|---|
| 1) Sum nýtt litra j í § 12, 1. stk. verður sett:<br>"Søla, undantikin sølu til heilsølu ella smásølu av fiski og skeljadýrum, lindýrum og øðrum ryggleysum vatndýrum (jbr. 3. kap. í toll- og vøruskránni)." | 1) Som ny litra j i § 12, stk. 1 indsættes: "Salg, bortset fra salg til grossister eller detailforretninger af fisk og krebsdyr, bløddyr og andre hvirvelløse vanddyr (jfr. kap. 3 i told og varefortegnelsen)." |

2) Sum nýggj § 12, 3. stk. verður sett:
"Landsstýrið ásetir reglur um, at hóast ásettu regluna í 2. stk. kann søla, ið er útleiging av kamari til útlendsk ferðafólk, haldast uttan fyri avgjaldsskylduga sølu."
Stk. 3, 4 og 5 verða ávikavist stk. 4, 5. og 6.

3) Sum nýggj § 12, stk. 7 verður sett:
"Landsstýrið ásetir reglur um, at avgjaldsskyldug søla sambært hesi lóg ikki fevnir um sølu av bókum."

4) § 20, 3. stk. verður soljóðandi:
"Virkir, ið javnan hava negativa avgjaldsupphædd, kunnu fáa loyvi at avrokna eina ferð um vikuna. Avgjaldstíðarskeiðið kann bert broytast soleiðis, at hetta fer fram í byrjanini av avgjaldstíðarskeiðinum sambært 2. stk. Søkjast skal um hetta loyvi ein mánað frammanundan. Verður loyvi játtað virkjum sambært 3. stk., kunnu virkini ikki nýta avgjaldstíðarskeið sambært 2. stk. tey næstu 2 árini frá tí, at loyvið er játtað."

5) Í § 33, 1. stk. verður í staðin fyri orðið: "stórum" sett: "grovum".

6) Í § 33, 1. stk., litra b, verður "§ 12, 5. stk., 2. punktum" broytt til "§ 12, 6. stk., 2. punktum".

7) Í § 33, 3. stk. verða strikað orðini:
"sleppa undan at rinda landskassanum avgjald", og í staðin verður sett: "fáa avgjald útgoldið úr landskassanum".

2) Som ny § 12, stk. 3 indsættes:
"Landsstyret fastsætter regler for, at uanset regelen i stk. 2, kan salg, der er udlejning af værelse til udenlands rejsende, holdes udenfor afgiftspligtigt omsætning."
Stk. 3, 4 og 5 bliver henholdsvis stk. 4, 5 og 6.

3) Som ny § 12, stk. 7 indsættes:
"Landsstyret fastsætter regler om, at afgiftspligtig omsætning i henhold til denne lov ikke omfattes af salg af bøger."

4) § 20, stk. 3 affattes således:
"Virksomheder, der jævnligt har negativ afgiftstilsvar kan få tilladelse til at afregne en gang om ugen. Afgiftsperioden kan kun ændres således, at dette sker i begyndelsen af afregningsperioden i henhold til stk. 2. Der skal søges om denne tilladelse en måned i forvejen. Såfremt virksomheder bevilges tilladelse i henhold til stk. 3, kan virksomheder ikke benytte afgiftsperioden i henhold til stk. 2 de følgende 2 år efter, at tilladelsen er bevilget."

5) I § 33, stk. 1. Ingen ændring.

6) I § 33, stk. 1, litra b ændres "§ 12, stk. 4, 2. punktum" til : "§ 12, stk. 6, 2. punktum".

7) I § 33, stk. 3 udgår følgende: "til at unddrage landskassen afgift", og i stedet indsættes: "få udbetalt afgift fra landskassen".

8) Eingin broyting.

9) § 40, 1. stk. verður orðað soleiðis:
"Virki, ið eru skrásetingarskyldug sambært hesi lóg, og sum hava uppgjørt goymsluna pr. 31. desember 1992, og sum hava sent inn uppgerðina áðrenn 1. februar 1993, fáa 100% av innflutningsgjaldinum sambært løgtingslóg nr. 119 frá 23. desember 1991 um innflutningsgjøld, ið er goldið fyri vørur, ið eru innfluttar til víðari sølu, og sum ikki eru seldar áðrenn 1. januar 1993, endurgoldið í 1993."

10) § 40, 2. stk. verður orðað soleiðis:
"Innflutningsgjaldið sambært hesi grein verður endurgoldið í mun til bókførda skattliga virðið á vørugoymsluni og verður útgoldið í 3 pørtum í samsvari við avrokningartíðarskeiðið sambært § 20, fyrstu ferð í samband við annað avrokningartíðarskeið í 1993."

11) Sum nýtt 4. stk. í § 40 verður skoytt uppí:
"Í kunngerð sett sambært 3. stk. kann landsstýrið áseta, at vørugoymslan skal gerast upp sambært skattligu reglunum um uppgerð av vørugoymslu, og at uppgerðin skal váttast av løggildum ella skrásettum grannskoðara."

8) I § 38, stk. 2 indsættes efter ordet "regnes": "ikke".

9) § 40, stk. 1 affattes således:
"Virksomheder, der er registreringspligtige i henhold til denne lov, og som har opgjort lager pr. 31. december 1992, og som har indsendt opgørelsen før 1. februar 1993, får 100% af indførselsafgiften i henhold til lagtingslov nr. 119 af 23. december 1991 om indførselsafgift, som er betalt for varer, der er indført til videre salg, og som ikke er solgt inden 1. januar 1993, tilbagebetalt i 1993."

10) § 40, stk. 2 affattes således:
"Indførselsafgiften i henhold til denne bestemmelse, bliver tilbagebetalt i henhold til den bogførte skattemæssige værdi af varelageret, og udbetales i 3 rater i overensstemmelse med afregningsperioden i henhold til § 20, første gang i forbindelse med anden afregningsperiode i 1993."

11) Som nyt stk. 4 i § 40 tilføjes:
"I bekendtgørelse i henhold til stk. 3 kan landsstyret fastsætte, at varelageret skal opgøres efter de skattemæssige regler om opgørelse af varelageret, og at opgørelsen skal underskrives af en autoriseret eller registreret revisor."

# 2. Viðvíkjandi viðgerðini av rúsdrekkamisnýtarum her á landi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at tryggjað neyðugan fíggjarkarm til viðgerðiua av rúsdrekkamisnýtarum og at virksemið hjá verandi viðgerðarstovnum heldur óhindrað fram.

**Viðmerkingar:**

Tá álitið í løgtingsmáli nr. 84/1991: Løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka (l.m. 68/90) í februar mánað 92 var til viðgerðar og nógv umtalaðu broytingarnar í rúsdrekkalógini vórðu samtyktar við teprum meiriluta á tingi, álegði løgtingið landsstýrinum at seta í verk hóskandi tiltøk við tí endamáli at minka um rúsdrekkanýtsluna í Føroyum.

Hóast sjálvmótsøgn í hesum fyrst at samtykkja lógarbroytingar til økta rúsdrekkanýtslu, og síðan at samtykkja tiltøk um at minka rúsdrekkanýtsluna, so má sigast, at hetta uppskot samgongumanna, var ein ásannan av, at um ikki fyrr, so varð neyðugt nú - eftir at nýggj rúsdrekkalóg varð samtykt - at seta neyðug tiltøk í verk.

Nær tengt at hesum uppskoti varð stórur dentur lagdur á neyðuga peningajáttan.

T.d. varð í samband við viðgerðar- og eftirviðgerðarspurningin m.a. beinleiðis sagt: "..... tað almenna eigur her og nú at sýna viðgerðar- og eftirviðgerðarspurninginum nógv størri ans, enn gjørt hevur verið higartil. Hetta merkir so aftur, at tingið eigur at játta størri upphæddir til viðgerð og eftirviðgerð av rúsdrekkamisnýtarum..." (s. 33 í álitinum, cit. frá samgonguumboðunum).

Eitt at ivast í, at hesi "føgru orð" - og onnur í síðsta enda vóru viðvirkandi til, at uppskotið um nýggju rúsdrekkalógina fekk tær neyðugu 17 atkvøðurnar fyri at verða samtykt!

Hvussu hevur so gingist, kann ein spyrja? Jú, tiltøk til tess at fáa lættari fatur í rúsdrekka eru sum kunnugt longu sett í verk, meðan ikki so kann sigast um tiltøkini, ætlað at minka um rúsdrekkamisnýtsluna.

Beint tvørturímóti tí, ið áður varð boðað frá, hevur samgongan skert fíggjarkarmin soleiðis, at játtanin til "Hjálpargr. móti alkoholmisnýtslu" er lækkað við heilum 500.000 kr.

Somuleiðis er játtanin til Blákrossheimið lækkað, meðan Heilbrigdið stríðist við at fáa pening til vega til neyðugan rakstur.

Undir 2. viðgerð av rúsdrekkalógaruppskotinum samtykti tingið uppskot frá undirritaða, har álagt varð landsstýrinum sum skjótast at seta í verk miðvíst upplýsingararbeiði, sum hevði til endamáls at minka um rúsdrekkanýtsluna her á landi, og var undirritaði samdur við samgonguumboðunum, at her, eins væl til viðgerð og eftirviðgerð, varð neyðugt við størri játtanum.

Tí kann tað ikki annað enn undrað og má sigast beinleiðis at vera í mótsøgn til samtykta álit, at upphæddin til nevndu endamál verður skerd.

Skal talan verða um álvarsemi í "føgru orðum" samgongunnar um neyðugan miðvísan rúsdrekkapolitikk, so er tað heilt burturvið at lækka játtanina til upplýsingar-, viðgerðar- og eftirviðgerðarvirksemi.

Í staðin eigur landsstýrið alt fyri eitt at bera so í bandi, at játtanin til "alkoholgrunnin" verður í minsta lagi tær 1.2 mió. kr., ið upprunaliga vórðu játtaðar fyri 1992, og at játtanin til Blákrossheimið í minsta lagi verður tær 5 mió. kr., ið Blákrossheimið hevði at arbeiða við í 1989.

Hvat Heilbrigdinum viðvikur er tað somuleiðis neyðugt, at hesum stovni verður tryggjað støðugan fíggjarkarm um virksemi hansara. Sum skilst, hava starvsfólk á hesum stovni ikki fingið løn síðani juni 92.

Blákrossheimið og Heilbrigdið hava hvør í sínum lagi havt ein týðandi lut í viðgerðini og eftirviðgerðini av rúsdrekkamisnýtarum, og kann tað ikki annað enn undrað, at landsstýrið nú hevur ætlanir um, at skerja virksemið hjá hesum stovnum, serliga hjá Blákrossheiminum, munandi og seta nýggja deild á stovn innan sjúkrahúsverkið. Henda sokallaða "Avrúsingardeildin" verður løgd undir psykiatrisku deild á landssjúkrahúsinum, meðan viðgerðin eftir uppskotinum verður løgd á Velbastað soleiðis, at Heilbrigdið og Blákrossheimið í felag "halda fram at viðgera sum tey er von.." (cit.)

Óskiljandi tykist, at lagt verður soleiðis eftir Blákrossheiminum og virksemi tess, ikki minst tá hugsað verður um, at kostnaðurin at reka henda stovn bert liggur um 75,00 kr. pr. song/døgn. Í henda prís er íroknað avrúsing, viðgerð, ambulant viðger, familjuviðgerð, vitjanir til fyrrv. búfólk og familjur teirra, búfelagsskapurin í Kongagøtu o.s.fr.

Tá hugsað verður um, hvat ein song pr. døgn kostar innan sjúkrahúsverkið, er tað heilt burturvið at skerja virksemið hjá Blákrossheiminum og í staðin seta nýggja "avrúsingar"-deild á stovn, sum helst kemur at kosta 4-5 ferðir tað, sum Blákrossheimið í dag megnar at reka stovnin fyri.

Tað at tvey ymisk tilboð í dag standa teim í boði, ið hava viðgerð fyri neyðini, kann bert metast sum gagnligt, og mong munnu tey vera, sum gjøgnum virksemið hjá hesum báðum stovnum - og øðrum felagsskapum við - hava fingið neyð-

uga hjálp til eina nýggja byrjan - teimum sjálvum, familjum teirra og samfelagnum til gagns.

Tí eigur landsstýrið, at sleppa ætlanunum um at skerja virksemið hjá hesum stovnum, men í staðin tryggja at teirra virksemi óhindrað heldur fram.

## Álit

í

*løgtingsmáli nr. 2/1992: Viðvíkjandi viðgerðini av rúsdrekkamisnýtarum her á landi.*

Málið er lagt fram av Tordi J. Niclasen tann 18. desember 1992 og eftir 1. viðgerð 20. august 1992 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og vísir ein samd nevnd til álitið í løgtingsmáli nr. 34/92: Fíggjarløgtingslóg 1993 (2. framløga).

Vísandi til nevnda álit tekur ein samd nevnd undir við, at neyðugur fíggjarkarmur verður tryggjaður, men tekur ikki støðu til, hvussu hetta skal skipast.

Í fyriliggjandi máli setir ein samd nevnd einki uppskot fram.

# 3. Søla av fastognum hjá postverkinum

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um sølu av fastognum hjá postverkinum.*

**§ 1.**

Postverki Føroya verður eftir góðkenning landsstýrisins heimilað at selja hesar ognir:

1) Matr. nr. 211b, Glyvrar.
2) Matr. nr. 642a, Tórshavn.
3) Matr. nr. 496c, Tvøroyri.
4) Matr. nr. 478, Tvøroyri.

*lagtingslov om salg af ejendomme tilhørende postvæsenet.*

**§ 1.**

Postvæsenet bemyndiges med landsstyrets godkendelse til at sælge disse ejendomme:

1) Matr. nr. 211b, Glyvrar.
2) Matr. nr. 642a, Torshavn.
3) Matr. nr. 496c, Tvøroyri.
4) Matr. nr. 478, Tvøroyri.

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

**Viðmerkingar:**

Postverkið hevur biðið landsstýrið um loyvi at selja ávísar ognir í Tórshavn, Saltangará og á Tvøroyri.

Landsstýrið kann av sínum eintingum loyva postverkinum at keypa fastar ognir, meðan løgtingið sambært § 19 í stýrisskipanarlógini skal lóggeva, um selt verður.

Landsstýrið er fyri sín part sinnað at loyva postverkinum at selja nevndu ognir og leggur sostatt samsvarandi lógaruppskot fyri løgtingið.

Matr. nr. 211 b, Glyvrar, er eitt grundstykki, vídd 1350 m², á kaiøkinum í Runavík, sum Postverkið upprunaliga hevði ætlanir um at byggja á. Tær ætlanirnar eru nú sleptar.

Postverkið leigar eina hædd í húsunum hjá Runavíkar kommunu.

Samráðingar hava verið millum kommununa og Postverkið og eru partamir vorðnir samdir um, at Postverkið keypir ta hæddina, teir leiga (miðhæddina) kontant fyri: ..... 2.200.000 kr.
og harafturat skeytar kommununi matr. 211b uttan gjald,
virði sett til ..... 108.000 kr.
Soleiðis at keypspeningurin verður ..... 2.308.000 kr.

Postverkið hevur tøkan pening í rakstrar- og íløgugrunninum og loyvi landsstýrisins til keypið.

Matr. nr. 642a, Tórshavn, sethús á Skansavegi 3, ið hava verið brúkt sum leiguíbúð hjá starvsfólki í postverkinum. Postverkið er ikki áhugað at hava húsini longur og metir tað vera rættari at selja tey.

Matr. nr. 496c, Tvøroyri, grundøki, vídd 1165 m², ið varð keypt í 1967 at byggja posthús á. Tá nú nýtt posthús verður bygt aðrastaðni á Tvøroyri, er eingin orsøk til at hava hetta grundøki liggjandi. Økið hevur sum er tann klausulin á sær, at har bert má byggjast posthús.

Matr. nr. 478, Tvøroyri er gamli posthúsbygningurin. Tá nýggja posthúsið er liðugt at taka í nýtslu, væntandi um hálvtannað ár, er ætlanin at selja gamla posthúsið.

# 4/1. Grannskoðan av almennum roknskapum

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Føroya Landskassa fyri fíggjarárini 1985-1988 við niðanfyristandandi viðmerkingum.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

**1. Endamál við grannskoðanini:**

Arbeiðsuppgávurnar hjá løgtingsgrannskoðarunum eru ásettar í løgtingslóg nr. 16 frá 26. apríl 1965. Sambært lógini er ásett, at:

**§ 3.**

Løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum hvørt árs roknskapir og ansa eftir, at allar inntøkur og útreiðslur eru komnar við inn í roknskapin, og heraftrat at ongin útreiðsla er hildin, sum ikki hevur heimild í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg.

Løgtingsgrannskoðararnir skulu hava eyguni eftir, at tað hevur verið forsvarliga húsað í fyrisitingini av midlum landsins og virkjum tess.

Løgtingsgrannskoðararnir skulu leggja roknskap landskassans, roknskapir hjá stovnum landskassans, ið hava sjálvstøðugan roknskap og roknskapir hjá stovnum landsins, ið landsstýrið annars fyrisitur, fyri løgtingið til avgerðar við frágreiðing og uppskotum.

Í reglugerðini fyri løgtingsgrannskoðararnar frá 27. mars 1985 er ásett, at í seinasta lagi 16 mánaðir aftaná, at løgtingsgrannskoðararnir hava fingið ein roknskap, verða teir at geva løgtinginum álit um hann.

Sum nevnt skulu løgtingsgrannskoðararnir sambært § 3 "hava eyguni eftir, at tað hevur verið forsvarliga húsað í fyrisitingini av landsins midlum og virkjum tess."

Umframt játtanar- og heimildareftirlit er endamálið við grannskoðanini hjá løgtingsgrannskoðarunum sostatt eisini at meta um, í hvønn mun ein stovnur ella partar av fyrisitingini á ávísum økjum ella sum heild hava loyst sínar uppgávur á ein sparnan hátt, og um úrslitini svara til endamálið og fortreytirnar fyri játtanini á fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg. Hesin parturin av grannskoðanini verður van-

liga nevndur fyrisitingargrannskoðan og í hesum sambandi verða vanliga hugtøkini sparsemi, produktivitetur og effektivitetur havd í huga.

Samanumtikið kann sigast, at løgtingsgrannskoðarunum er álagt at grannskoða út frá sokallaðum góðum almennum grannskoðanarsiði.

## 2. Roknskapargrannskoðanin

Sum grundarlag fyri arbeiðinum hjá løgtingsgrannskoðarunum er í lógini ásett:

§ 4

Fyri beinleikan av tí, sum í roknskapinum stendur, hava løgtingsgrannskoðararnir rætt til at taka váttanir o.t. frá roknskapargrannskoðingini sum nóg gott prógv.

Sambært § 8 í lógini stílar fíggjarnevndin fyri roknskapargrannskoðanini.

Roknskapargrannskoðanin av landskassans roknskapum er býtt upp soleiðis, at tann landskassabókføring, sum verður ført og umsitin av Føroya Gjaidstovu, verður grannskoðað av internu grannskoðanardeild landskassans, undir eftirliti av løgtingsins statsautoriseraða grannskoðara, sambært reglugerð, ásett av Føroya Landsstýri 9/6 1976.

Viðvíkjandi grannskoðanini av teim sosialu útreiðslunum, har talan er um ríkisendurgjald, er gjørd serlig avtala millum Socialministeriet og Fíggjarnevnd Føroya Løgtings dagfest 15/10 1991, ið áleggur grannskoðanardeild landskassans at grannskoða hetta øki eftir serligum reglum.

Teir stovnar, sum hava sjálvstøðuga bókføring og roknskap, koma undir grannskoðan av grannskoðanardeildini, men verða grannskoðaðir av eksternum, privatum grannskoðarum.

Reglugerðir landsstýrisins frá 1976 fyri internu grannskoðanardeild landskassans ásetir ikki fyrisitingargrannskoðan/grannskoðan eftir góðum almennum grannskoðanarsiði.

Fyri ta eksternu privatu grannskoðanina av almennum stovnum annars og fyri løgtingsins statsautoriserøða grannskoðara eru ikki fyriskipaðar serligar grannskoðanarreglur og ikki ásett, at grannskoðanin skal fara fram eftir góðum almennum grannskoðanarsiði.

Bert tá talan er um grannskoðan av tí partinum av teim sosialu útreiðslunum, har talan er um ríkisendurgjald, er ásett, at grannskoðanin skal fara fram eftir góðum almennum grannskoðanarsiði, og víst verður, sum vanligt er í tí sambandinum, til § 3 í tí donsku landsgrannskoðanarlógini.

Vísandi til omanfyristandandi má tað sigast at vera sera óheppið, at løgtingsgrannskoðararnir sum grundarlag fyri virki teirra mega byggja á eina roknskapargrannskoðan, har tað ikki í øllum førum eru ásett grannskoðanarkrøv, ið svara til tað støðið, tey krøv og ta ábyrgd, ið er áløgd løgtingsgrannskoðarunum mótvegis løgtinginum, sambært lógini.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt hesi viðurskifti, og við skrivi dagfest 4. februar 1992 heitt á løgtingsgrannskoðararnar um at viðgera hetta mál sum skjótast og innan 15. mars 1992 at lata álit til formannsskap løgtingsins. Løgtingsgrannskoðararnir arbeiða við einum lógaruppskoti, ið er ætlað at vera ein partur av álitinum. Roknað verður við, at arbeiðið verður liðugt til komandi tingsetu.

Eisini hevur tað verið darvandi fyri gjøgnumgongdina av teim almennu roknskapunum, at so at siga eingi krøv eru ásett til roknskaparuppsetan, roknskaparprinsippir, útgreiningar, frágreiðing v.m.

## 2. Viðmerkingar í seinasta álitið frá løgtingsgrannskoðarunum

Í seinasta áliti frá løgtingsgrannskoðarunum viðvíkjandi grannskoðan av roknskapum hjá Føroya Landskassa, dagfest 2/4 1987, varð gjørt vart við fleiri átaluverd viðurskifti:

**a:** Ongin eykafíggjarlóg

Átalað varð, at ongin eykafíggjarlóg fyriliggur síðani fíggjarárið 1982/83.

Í dag má ásannast, at ikki fyrr enn í 1991 legði landsstýrið fram eina eykafíggjarlóg.

**b:** Meirýtsla uttan heimild.

Gjørt varð vart við, at tað ikki ber til, at ein fíggjarlóg verður gjørd og at eykaútreiðslurnar verða bornar av óformaliseraðum yvirtrekkum. M.a. varð nevnt, at í hesum tíðarskeiði eru stór yvirtrekk framd viðvíkjandi um- og nýbygging á ymiskum økjum, og varð hetta harðliga átalað.

**c:** Ov lítið avsett í grunnar.

Átalað varð, at alt ov lítið varð sett av til grunnin til endurnýggjan av fiskiskipaflotanum og til grunnin fyri effektivum veðbaldum.

Í roknskapinum fyri 1987 og 1988 vóru partar av rakstraryvirskotinum avsettir í hesar grunnar.

**d:** Veðhaldsútlegg.

Átalað varð harðliga, at lítið og einki hendi við teimum útleggum, sum landskassin hevur havt, og at fleiri av feløgunum vóru farin á húsagang fyri langt síðani. Heitt varð tí á landsstýrið at skunda undir eina upprudding í hesum útleggum og annars fáa kravt inn, tað sum møguligt er at fáa inn.

Í dag má ásannast, at hóast hesa átalu og áheitan er alt ov lítið gjørt á hesum øki.

**e:** Onnur viðurskifti.

Av øðrum viðurskiftum, ið gjørt varð vart við, kann nevnast, at mælt varð til eina samskipan av EDV-nýtsluni. Løgtingsgrannskoðararnir meta, at hóast tað er settur ein edv-ráðgevi, er als ikki gjørt nóg mikið á hesum øki.

## 3. Viðmerkingar frá roknskapargrannskoðanini

Í sambandi við gjøgnumgongd av landskassaroknskapinum fyri fíggjarárini 1985 -1988 hava løgtingsgrannskoðararnir viðgjørt revisiónsfrágreiðingarnar frá internu grannskoðanardeild landskassans og løgtingsins statsautoriseraða grannskoðara.

### Generellar viðmerkingar

Gjørt verður vart við, at spurningurin um heimild til at rinda út um játtanirnar á fíggjarlógini ikki verður loystur, og at hetta er í stríð við § 21 í løgtingslóg nr. 1 frá 1948 um stýrisskipan Føroya í sermálum:

Áðrenn fíggjarlóg ella bráfeingis fíggjarlóg er samtykt á løgtingi, má skattur ikki verða kravdur.

Eingin útreiðsla má verða goldin, ið ikki er heimilað í fíggjarlóg ella aðrari galdandi heimildarlóg. Tær játtanir, ið eru ásettar í fíggjarlóg ella aðrari heimildarlóg, mega bert verða goldnar í tí fíggjarári, sum fíggjarlógin er galdandi. Tó kann landsstýrið í tíðarskeiði inntil 3 mánaðar aftaná, fíggjarárið er endað, ávísa pening, ið er játtaður á fíggjarlógini fyri árið, ið fór.

Viðvíkjandi virðismeting av aktivum verður gjørt vart við, at landsstýrið eigur at taka støðu til og fáa bókført neyðturvuligar avskrivingar, har sum feløg eru farin á húsagang ella eru strikað í partafelagsskrásetingini, har er m.a. talan um veðhaldsútlegg, virðisbrøv og tollkredit.

Viðvíkjandi skráseting av veðhaldsskyldum, ger gjaldstovan øll árini vart við, at landskassans roknskapur viðvíkjandi veðhaldsskyldum ikki er eftirfarandi á øllum økjum m.a. orsakað av, at allar upplýsingar ikki koma gjaldstovuni í hendi.

Somuleiðis ger gjaldstovan hesi árini upp, hvussu stórur partur av hesum veðhaldsskyldum er fallin til gjaldingar, men ikki bókaður í roknskapinum. Ultimo hesi árini er her talan um upphæddir ímillum 110 og 160 mió. kr., har landskassin sum sjálvskuldnarkautionistur hevur fingið áheitan frá peningastovni um at gjalda. Í flestu førum er sostatt reelt talan um stuttfreistaða skuld, ið verður høgt rentað, í nógvum førum við trotaprovisión.

Í nógvum førum svarar landsstýrið ikki fyrispurningum frá roknskapargrannskoðanini og tekur sær ikki tykni av viðmerkingum og áheitanum.

### Serligar viðmerkingar tey einstøku árini.

Roknskapargrannskoðanin hevur herumframt í revisiónsfrágreiðingunum til landskassaroknskapirnar fyri tey einstøku árini gjørt viðmerkingar um ymisk viðurskifti. Niðanfyristandandi verður gjørt vart við nakrar av hesum viðmerkingum fyri tey einstøku árini sær.

**1985**

Gjørt verður vart við, at bert fá havnaverk avrokna lestagjøld.

Átalað verður at Vaktar- og Bjargingartænastan fíggjar keyp av "Spógvanum" yvir konto "ymiskar inntøkur". Upplýst varð fyri landsstýrinum, at kostnaðurin var 500 t. kr., árligu rakstrarútreiðslurnar mettar til 200 t. kr. Landsstýrið samtykkir at geva loyvi at keypa bátin. Málið varð ikki lagt fyri fíggjarnevndina. Kostnaðurin bleiv næstan 1 mió. kr., og í 1986 bað stovnurin um 955 t. kr. til rakstur av bátinum fyri 1987.

Gjørt verður vart við, at tollvaldið hevur upplýst, at teir ikki hava manning til at kanna, um kunngerðin um tollkreditt verður fylgd viðvíkjandi ásetingini um, at vørumóttakarin ikki hevur loyvi at pakka vørurnar út, fyrr enn gjaldstovan hevur fingið øll skjølini.

**1986**

Hóast 2 áheitanir hevur grannskoðanin ikki fingið fullgott svar frá Líkningarráðnum um gjøldini til Elektron samsvara tí, ið er ásett í sáttmálanum millum Elektron og landsstýrið.

Landsstýrið hevur ikki svarað uppá fyrispurning viðvíkjandi meirnýtslu til ítrótt.

Gjørt verður vart við at útgoldnar vóru 3,6 mió. kr. til P/F Harenga í Gøtu, áðrenn løgtingið samtykti lógina um endurgjald í sambandi við avtøku av sjúkum smolti og fyribyrging v.m., har landsstýrinum varð heimilað at nýta 4 mió. kr. til hetta endamál.

**1987**

Tá eykajáttanirnar frá fíggjarnevndini upp á 38 mió. kr. verða tiknar við, verða bruttomeirútreiðslurnar 92 mió. kr. viðvíkjandi rakstri.

Meirnýtslan úr grunninum til berghol og brúgvagerð var 28 mió. kr., og samlaða meirnýtslan hjá Landsverkfrøðinginum var í 1987 góðar 34 mió. kr.

Á almannaøkinum er meirnýtslan 40 mió. kr. og stavar frá broytingum í takstum, frá nýggjum lógum um m.a. barnastyrk, eykaviðbót til avlamispensiónistar, serveiting til pensiónistar v.fl., vøkstri í útreiðslunum til alkoholikaraviðgerð og stovnsetan av vardum verkstøðum.

Frá 1/4 1986 til og við 1988 hevur verið innkravt kr. 100 ov lítið í sýnsgjøldum pr. bil, í alt mett til 4,7 mió. kr., vegna ov vánaligt samskifti millum gjaldstovuna og landsstýrið, ið broytir kunngerðirnar.

Roknskapargrannskoðanin undrast á, at Bileftirlitið, ið hevur havt henda miss, ikki hevur gjørt vart við seg.

Viðvíkjandi grunnum verður nevnt, at við verandi skipan eru játtanir í grunn ein heimild til at brúka pening uttan um tær árligu fíggjarlógirnar. Gjørt verður vart við, at uppsetingin av grunnum í roknskapinum er torskild og bókað sum

aktiv, passiv, byggiroknskapir og innistandandi í bankum, og at tað eru avsettar íalt 290 mió. kr. ov lítið til nýtslu úr grunninum.

Viðvíkjandi landskassaveðhaldum eftir lóg nr. 13/67 um veðhald til prioritetslán til fiskiskip upp til 50 mió. kr. verður gjørt vart við, at við árslok 1986 veðhelt landskassin fyri 59,5 mió. kr. og við árslok 1987 fyri 90,7 mió. kr.

**1988**

Rakstrarroknskapurin vísir eitt yvirskot upp á 32,8 mió. kr. Um landskassagrunnarnir vóru tiknir við í raksturin broytist rakstraryvirskotið til eitt hall uppá 191 mió. kr. ella 212 mió. kr., um útreiðslurnar til tunnil undir Vestmannasund upp á 21 mió. kr. vórðu lagdar aftrat.

Tá eykajáttanirnar verða tiknar við, verður bruttomeirnýtslan á rakstrinum 202 mió. kr. Við meirnýtsluni í grunnunum upp á 65 mió. kr. og bygging uttan heimild verður samlaða bruttomeirnýtslan í 1988 272 mió. kr. Tá eru slíkar byggingar sum Royndarstøðin og Bileftirlitið í Havn, sum eru vorðnar væl dýrari enn upprunaliga mett, ikki tiknar við.

Saman við meirnýtsluni hjá grunnunum var samlaða bruttomeirnýtslan á grein 13, samferðslumál, 102 mió. kr.

**Á almannaøkinum er meirnýtslan 43 mió. kr.**

Í grannskoðanarfrágreiðingini fyri almannaøkið verður gjørt vart við grundleggjandi trupulleikar í samband við grannskoðan av hesum øki, m.a. viðvíkjandi manning og arbeiðsbýti. Ein partur av hesum trupulleikum er loystur í samband við, at serlig grannskoðanaravtala er gjørd ímillum fíggjarnevndina og socialministeriet samstundis, sum grannskoðanardeildin nú hevur fingið størri játtan. Annars varð gjørt vart við, at roknskapareftirlitið á Almannastovuni á fleiri økjum ikki var nóg trygt, og at fleiri feilir viðvíkjandi útrokning av ríkisendurgjaldi vóru ávístir.

Í eini frágreiðing til tingið, dagfest 31. august 1988, siga løgtingsgrannskoðararnir, at hvørki landsgrannskoðanin ella gjaldstovan hava verið nøgd við ávísingar hjá landsstýrismanninum í almannamálum. Sagt varð, at talan var um tilvildarligar útgjaldingar av kontoini fyri alkoholmisnýtslu, mennigarhjálp og landsstýrinum at ráða yvir, og mælt varð til, at útgjaldingar vegna nevndu konti vórðu steðgaðar.

Stórt tal av ávísingum vóru farnar út av kontoini "landsstýrinum at ráða yvir", uttan at umsókn var komin til landsstýrið, og stórar upphæddir vóru farnar út av grunninum fyri alkoholmisnýtslu til gjaldkomna skuld hjá vanligum viðskiftafólki á matstovu, eins og talið á sosialum veitingum úr landskassanum meira gekk eftir geografiskum enn sosialum tørvi.

Formansskapur løgtingsins heitti álvarsliga á landsstýrið, um at bera so í bandi, at tað ikki skuldi kunna lata seg gera, at brúka almennan pening í heimildarloysi og tilvildarliga, og at reglugerðir tí viðvíkjandi máttu fáast at virka sum skjótast.

Landsstýrið undirskrivaði 7/7-1988 sáttmála um keyp av ferðaseðlamaskinum frá BUSCOM uttan fíggjarheimild. Fíggjarnevndin játtaði á fundi 18/7-1989 landsstýrinum at gjalda írestandi 5 mió. kr.

Í tí sambandinum heitti fíggjarnevndin á løgtingsgrannskoðaramar um, saman við landsstýrinum at gera greiðar reglur um og leggja fastar karmar fyri fylgjurnar av embætisførslu og koma við uppskoti til løgtingslóg hesum viðvíkjandi til komandi ólavsøkutingsetu.

Hetta lógaruppskot er til viðgerðar í rættarnevndini saman við lógaruppskotinum um fyrisiting, alment innlit og løgtingsins umboðsmann.

Viðvíkjandi fíggjarlógarviðgerðini verður viðmerkt, at bert rakstrarætlanin verður viðgjørd, meðan ognar- og kapitalkontoin verður tilvildarliga sett upp.

Gjørt verður vart við, at tríggjar umbyggingar eru farnar fram uttan fíggjarheimild, talan er um toll-, gjald- og almannastovuna, í alt 7,4 mió. kr.

Gjørt verður vart við, at bókingarhátturin viðvíkjandi grunnunum, kurstapi og mótrokning ikki geva eina rættvísandi mynd av rentuinntøkum og útreiðslum. Víst verður á, at landskassin við árslok 1988 hevði lagt út 3 mió. kr. vegna kassakredit hjá Sjónvarpinum, sum landsstýrið við heimild í lóg nr. 77/1982 hevði veðhildið fyri, hóast lógin ikki gevur heimild til at taka lán til rakstur.

Viðvíkjandi leiguinntøkum verður víst til skriv frá gjaldstovuni til landsstýrið, har nevnt verður, at lítið skil er á innkrevjingini.

Viðvíkjandi millumrokningum, verður víst á, at talan er um nógvar konti, sum skuldu verið uppgjørdar fyri nógvum árum síðani.

Viðvíkjandi leasing hevur grannskoðanin til fánýtis biðið um landsstýrisins støðu til, um leasing er at sammeta við lán.

**Viðmerkingar**

Í sambandi við gjøgnumgongdina av roknskapunum hava løgtingsgrannskoðaramir hesar viðmerkingar:

1. Løgtingsgrannskoðaramir ásanna, at teir sjálvir ikki hava verið nóg aktivir á grannskoðanarøkinum seinastu árini og áttu at fylgt tí arbeiðnum betri upp, enn gjørt varð. Tískil liggur nógv arbeiði hjá nevndini niðurfyri.
2. Átalað verður, at øll sitandi landsstýri síðani fíggjarárið 1982/83 ikki hava yvirhildið grein 21 í stýrisskipanarlógini og ikki tikið stig til at fáa hesi viðurskifti í rættlag, hóast nógvar átalur og áheitanir. Eisini verður átalað, at landsstýrið í nógvum førum als ikki svarar fyrispurningum ella tekur sær tykni av viðmerkingum og áheitanum frá roknskapargrannskoðanini og frá løgtingsgrannskoðarunum og harvið eisini frá løgtinginum.

3. Fegnast verður um tey stig, sum eru tikin til at bøta um mannagongdina viðvíkjandi fíggjarviðurskiftunum, so sum ger av eykafíggjarlóg í 1991, avtøka av teim flestu landskassagrunnunum og lóg nr. 116 frá 20. desember 1991 um heimild til lán/nýtslu (løgtingsmál nr. 39/1991).
4. Átalað verður, at landsstýrið ikki hevur sýnt neyðugt fíggjarligt umhugsni viðvíkjandi útláns- og veðhaldsvirksemi landsins. Í alt ov stóran mun hevur landsstýrið umsitið givin lán og veðhald uttan at fylgja nóg væl við og taka neyðug stig mótvegis lántakarum, ið ikki halda sínar skyldur. Hetta hevur økt munandi um landskassans tap og viðført stórar meirrentur og verið til skaða og forða fyri eini menning av tí partinum av vinnuni, ið hevur roynt at hildið sínar skyldur og bygt á eitt meira umhugsað grundarlag.
5. Løgtingsgrannskoðararnir meta, at ein stórur partur av aktivunum, ið standa í landskassaroknskapinum, eingi virði hava, og áleggja landsstýrinum at taka stig til eina upprudding á hesum øki.
6. Viðvíkjandi landskassaroknskapinum verður álagt landsstýrinum at áseta grundleggjandi roknskaparprinsippir á týðandi økjum, so sum avskrivingar/avsetingar móti tapi, virðismeting, veðhaldsskyldur, kurstap/-vinning, bóking av status o.s.fr., og at hetta verður gjørt í samband við, at tað eisini verða ásettar nærri reglur fyri uppsetan av ársroknskapi hjá teim almennu stovnunum/grunnunum.
7. Mælt verður landsstýrium til sum skjótast at taka stig til ein samskipaðan edv-politikk, har hugsað verður fleiri ár fram, og at støða í tí sambandinum verður tikin til, hvussu framtíðar roknskaparhald og fíggjarstýring eigur at skipast, og hvussu bygnaðurin skal broytast.
8. Mælt verður landsstýrinum til at endurskoða og broyta kunngerðina um tollkreditt, so tapini á hesum øki framyvir gerust minni. Í hesum sambandi verður mælt til, at heimild verður givin til at nokta at útflýggja vørur, fyrr enn gjaldkomin skuld til tollvaldið er goldin. Í sambandi við komandi MVG-skipan verður mælt til stórt varsemi og umhugsni viðvíkjandi kreditti og innkrevjing.

# Álit

í

*løgtingsmáli nr. 4/2 1992: Grannskoðan av almennum roknskapum.*

## Uppskot

## til

## samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Strandfaraskipum landsins fyri fíggjarárini 1989-1991 við niðanfyristandandi viðmerkingum.

**Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:**

**1. Endamál:**

Sambært reglugerð frá 22. august 1984 (nr. 81) er Strandfaraskip Landsins stovnur undir Føroya landsstýri, sum hevur til endamáls:

1. at reka rutusigling innanoyggja við fólki og farmi, rutukoyring við farmi og tyrluflutning,
2. at vera tænastuveitandi stovnur og í so stóran mun sum gjørligt rikin út frá handilsligum sjónarmiði,
3. at laga seg eftir menning samfelagsins,
4. at hava samvinnu á breiðum grundarlagi við samferðslunevndina, vaktar- og bjargingartænastuna, sjúkrahúsverkið, postverkið, telefonverkið, gjaldstovuna og aðrar almennar stovnar.

**2. Fíggjarviðurskifti:**

Sambært endamálsorðingina skal Strandferðslan í so stóran mun sum gjørligt rekast út frá handilsligum sjónarmiði.

Landsstýrið ásetir talið av starvsfólki og skal góðkenna ferðaætlanir, flutnings- og farmagjøld umframt allar ætlanir um útbygging, umskipan og nýskipan av Strandferðsluni.

Fíggjar-, rakstrar- og íløguætlan fyri Strandferðsluna skulu á hvørjum ári latast landsstýrinum til góðkenningar í seinasta lagi 1. oktober.

Til tess at kunna løgtingið um ta fíggjarligu gongdina hjá Strandferðsluni, er gjørdur ein samandráttur av ársroknskapunum fyri árini 1989-1991:

**3. Yvirlit yvir rakstur 1989-1991:**

| **Inntøkur:** | **1989** | **1990** | **1991** |
|---|---|---|---|
| Farmagjald | 16 | 15 | 14 |
| Persónsflutningur | 39 | 39 | 39 |
| Postflutningur | 1 | 1 | 1 |
| Eykatúrar (incl. tyrlur) | 6 | 4 | 9 |
| Kiosk & Cafeteria | 3 | 3 | 5 |
| Inntøkur samanlagt | 65 | 62 | 68 |
| | | | |
| **Útreiðslur:** | | | |
| Hýrur | 49 | 46 | 42 |
| Olja | 15 | 16 | 12 |
| Umsiting og eykalutir | 18 | 20 | 22 |
| Tryggingar | 5 | 4 | 4 |
| | | | |
| **Útreiðslur** | **1989** | **1990** | **1991** |
| Havnagjøld | 4 | 4 | 4 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur | 14 | 12 | 15 |
| Rakstrarútreiðslur samanlagt | 105 | 102 | 99 |
| | | | |
| Skrivstovulønir | 9 | 9 | 9 |
| Aðrar fyrisitingarútreiðslur | 7 | 7 | 7 |
| Rentuútreiðslur, netto | 2 | 2 | 3 |
| Avskrivingar, rakstrargøgn | 4 | 5 | 3 |
| Tap, skuldarar | 2 | - | 2 |
| Útreiðslur samanlagt | 129 | 125 | 123 |
| | | | |
| **Úrslit** | -64 | -63 | -55 |
| Játtan falt | 56 | 46 | 50 |
| Meirnýtsla | -8 | -17 | -5 |

**4. Yvirlit yvir gongd í fíggjarstøðuni 1989-1991:**

| **Aktiv:** | **1989** | **1990** | **1991** |
|---|---|---|---|
| Kassi, bank & Giro | 4 | 1 | 1 |
| Skuldarar | 9 | 10 | 11 |
| Eykajáttan | – | – | 8 |
| Bygningar og innbúgv | 3 | 3 | 2 |
| Bilar og truckar | 5 | 3 | 1 |
| Aktiv samanlagt | 21 | 17 | 23 |

| **Passiv:** | **1989** | **1990** | **1991** |
|---|---|---|---|
| Kassakredittur | 8 | 21 | 10 |
| Ognarar | 10 | 6 | 10 |
| Millumrokning, landskassan | 3 | -10 | 3 |
| Passiv samanlagt | 21 | 17 | 23 |

**5. Serroknskapir fyri skip, bilar og tyrlur:**

Umframt ársroknskap fyri samlaða virksemið hjá Strandferðsluni, ger Strandferðslan á hvørjum ári serroknskapir fyri hvørt skip sær, bilarnar og tyrlurnar undir einum.

Í serroknskapunum eru inntøkurnar og rakstrarútreiðslurnar útgreinaðar á tær ymsu flutningseindirnar. Niðanfyristandandi er gjørdur ein samandráttur av serroknskapunum fyri árini 1989-1991:

(mió.kr.)

| | **1989** | | | **1990** | | | **1991** | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **Inn-tøkur** | **Rakst.-útreiðs.** | **Úrs-lit** | **Inn-tøkur** | **Rakst.-útreiðs.** | **Úrs-lit** | **Inn-tøkur** | **Rakst.-útreiðs.** | **Úrs-lit** |
| Smyril | 11,8 | 21,9 | -10,1 | 11,1 | 19,7 | -8,6 | 9,6 | 20,4 | -10,8 |
| Teistin | 11,2 | 22,5 | -11,3 | 10,8 | 20,7 | -9,9 | 11,6 | 18,5 | -6,9 |
| Sam | 6,6 | 4,6 | +2,0 | 6,3 | 4,5 | +1,8 | 9,4 | 4,8 | +4,6 |
| Teman I | 3,0 | 3,5 | - 0,5 | 2,6 | 3,4 | -0,8 | 1,6 | 3,0 | - 1,4 |
| Teman | 9,0 | 7,3 | +1,7 | 9,8 | 8,0 | +1,8 | 11,8 | 7,4 | +4,4 |
| Dúgvan | 5,7 | 9,7 | - 4,0 | 6,0 | 8,7 | - 2,7 | 5,5 | 8,3 | - 2,8 |
| Tróndur | 3,2 | 6,7 | - 3,5 | 3,0 | 7,4 | - 4,4 | 4,2 | 7,3 | - 3,1 |
| Ritan | 1,5 | 3,2 | - 1,7 | 1,4 | 3,1 | - 1,7 | 1,0 | 3,4 | - 2,4 |
| Másin | 0,3 | 1,8 | - 1,5 | 0,3 | 1,8 | - 1,5 | 0,3 | 1,8 | - 1,5 |
| Pride | 0,3 | 1,3 | - 1,0 | 0,1 | 0,6 | - 0,5 | 0,5 | 1,5 | - 1,0 |
| Súlan | 0,1 | 0,8 | - 0,7 | 0,2 | 0,6 | - 0,4 | 0,2 | 0,7 | - 0,5 |
| Barskor | 0,5 | 1,5 | - 1,0 | 0,4 | 1,4 | - 1,0 | 0,6 | 1,4 | - 0,8 |
| Sildberin | 0,1 | 1,0 | - 0,9 | 0,1 | 1,2 | - 1,1 | 0,1 | 1,2 | - 1,1 |
| Skip ialt | 53,3 | 85,8 | -32,5 | 52,1 | 81,1 | -29,0 | 56,4 | 79,7 | -23,3 |
| Bilarnir | 5,3 | 7,6 | -2,3 | 6,0 | 7,6 | -1,6 | 6,0 | 7,2 | - 1,2 |
| Tyrlur | 5,9 | 11,7 | -5,8 | 3,9 | 13,3 | -9,4 | 5,3 | 12,4 | - 7,1 |
| Ialt | 64,5 | 105,1 | -40,6 | 62,0 | 102,0 | -40,0 | 67,7 | 99,3 | -31,6 |
| Aðrar útreiðslur | | | -23,2 | | | -23,2 | | | -23,7 |
| Samlað úrslit | | | -63,8 | | | -63,2 | | | -55,3 |

**6. Seinasta álit frá løgtingsgrannskoðarunum:**
Í seinasta áliti frá løgtingsgrannskoðarunum, dagfest 8. mei 1990, viðvíkjandi roknskapunum fyri 1983/84-1988 vísa løgtingsgrannskoðararnir á tað neyðuga í eini tryggari fíggjarstýring.

Løgtingsgrannskoðararnir gera eisini vart við viðmerkingarnar frá roknskapargrannskoðanini m.a. viðvíkjandi kredittveitan og ov seinari innkrevjing, eini ikki nøktandi roknskaparskipan og ov vánaligum samstarvi millum ta umsitingarligu og teknisku leiðsluna.

**7. Viðmerkingar frá roknskapargrannskoðanini.**
Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið ársroknskapirnar og grannskoðanarprotokollirnar til tess at vissa seg um, at rætt er farið fram bókhaldsliga og roknskaparliga hjá stovnunum.

Øll árini 1989 til 1991 ger roknskapargrannskoðarin í grannskoðanarprotokoll síni landsstýrið varugt við og átalar nærum teir somu grundleggjandi trupulleikarnar í sambandi við rakstur av Strandfaraskipum landsins. Eisini árini frammanundan hevur roknskapargrannskoðanin, uttan úrslit, gjørt vart við at kalla somu viðurskifti.

**1. Leiðslutrupulleikar**
Gjørt verður vart við øll árini, at samstarvið millum ta teknisku og umsitingarligu deildina ikki er nóg gott. Nevnt verður, at eisini tey ráðgevingarfeløg, sum hava gjørt gjøgnumgangandi analysu av leiðslu stovnsins, eru komin til somu niðurstøðu. Tað, sum ávíst verður, er, at tann umsitingarliga (økonomiska) deildin onga funktión hevur mótvegis tí teknisku deildini, tá allar økonomiskar avgerðir verða tiknar, sum um talan er um teknisk fyribrigdi. Hetta viðførir manglandi kostnaðarstýring og játtanareftirlit.

Nevnt verður eisini, at ein onnur orsøk til trupulleikarnar er, at høvuðsamboðið at stýra inntøkum/útreiðslum - nevniliga ferðaætlanin - verður løgd av øðrum almennum stovni. Soleiðis hevur leiðsla Strandferðslunnar ikki beinleiðis ávirkan á hesa ferðaætlan, sum fyrst og fremst er keldan til inntøkur og útreiðslur. (Sambært § 4 í reglugerðini, skulu uppskot til ferðaætlanir gerast av Strandferðsluni og Samferðslunevndini og góðkennast av landsstýrinum).

**2. Roknskaparviðurskifti**
Grannskoðarin ger í protokollunum øll árini vart við, at roknskaparuppsetanin hjá Strandferðsluni ikki er nóg informativ.

Nevnt verður, at roknskapurin fyri Strandferðsluna als ikki gevur ta røttu heildarmyndina av, hvat ið Strandferðslan kostar, eftirsum íløgur í skip og tyrlur og lántøka í hesum sambandi, bert verður bókað í landskassans roknskapi. Raksturin verður sostatt hvørki ávirkaður av avskrivingum ella rentum í hesum sambandi.

Á inntøkusíðuni verður víst til, at roknskaparskipanin ikki er uppbygd til at kunna sundurgreina inntøkugrundarlagið við verandi skipan við gjøgnumgangandi ferðaseðlakeypi.

Um ferðafólk keypir ferðaseðilin í einum bussi, fær Bygdalciðir alla inntøkuna, sum tó endurrindar ein part fyri bussflutningin eftir meting. Undir persónsflutning verður eisini bókað samlað upphædd, um talan er um ferðafólk/bil ella talan er um vørubil frá eini handilsfyritøku.

Farmaflutningur við bilum hjá Strandferðsluni verður bókaður til viðkomandi rutu á landi. Hetta vil siga, at flutningur við skipi er innroknaður í samlaða farmagjaldið. Eftir somu skipan sum fyri persónsflutning verður farmagjaldið bókað, har vøran verður send frá og hert til bilarnar.

Farmabræv fyri Strandferðslubilarnar verður ikki skrivað. Sostatt fellur onki farmagjald til skipini av hesum flutningi. Tó er eitt undantak. Har, sum flutningsavtala er gjørd, verður eftir metan tann samlaða upphæddin býtt millum skip og bilrutu, t.d. øl og sodavatn frá P/F Føroya Bjór. Skipini verða brúkt sum avloysaraskip fyri hvørt annað undir klassing v.m. Hetta fær ávirkan á inntøkutølini, eftir sum ruturnar ikki geva eins nógvar inntøkur.

Til at loysa hesar trupulleikarnar og til tess at samla neyðugar upplýsingar fyri planlegging av samferðslutørvinum vórðu tær sokallaðu Buskom maskinurnar keyptar í 1988.

Grannskoðarin metir tað vera sera undrunarvert, at hesar maskinur ikki eru tiknar í nýtslu. Nevnt verður, at tá tann finski leverandørurin kom til Føroyar at programmera systemið, mátti hann fara avstað aftur, tí tað grundleggjandi arbeiði her heima ikki var gjørt, nevniliga ein tabell, sum sigur, hvussu stóran part hvør stovnur (Bygdaleiðir ella Strandferðslan) skal hava fyri hvønn seldan ferðaseðil.

Grannskoðarin ger vart við, at tað neyvan kann hava verið ætlanin at keypa dýra útgerð, sum síðani bert verður sett á goymslu til at samla dust.

### 3. Kredittveiting

Grannskoðarin ger fleiri ferðir vart við, at avstemman og røkt av debitorum ikki er nóg góð, og at innkrevjingin gongur alt ov seint fyri seg. T.d. vóru fraktinntøkurnar í 1991 14,2 mió.kr. 31.12.1991 vóru vøruskuldararnir 7,6 mió.kr., svarandi til í meðal eina kredittfið upp á 6 mánaðir. Mælt varð til at krevja meira goldið kontant.

Í tíðarskeiðinum 1989-91 hevur Strandferðslan sambært roknskapirnar mist 4,4 mió.kr. sum tap upp á vøruskuldarar.

### 4. Meirnýtsla uttan játtan

Fyri árini 1988, 1989 og 1990 ger grannskoðarin í grannskoðanarprotokollini landsstýrið varugt við, at Strandferðslan í stóran mun hevur nýtt pening uttan at

hava játtan á fíggjarlógini, ella aðra lógarheimild til tess. Somuleiðis verður víst á, at henda meirnýtsla er fíggjað við lántøku uttan lógarheimild.

**5. Tyrluflúgvingin**

Í grannskoðanarprotokollini fyri 1990 ger grannskoðanin serliga vart við kostnaðarstøðið viðvíkjandi tyrluflúgvingini og metir, at hetta eigur at verða gjøgnumgingið.

**8. Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum um meirnýtslu og lántøku uttan heimild**

Sum omanfyri nevnt, hevur roknskapargrannskoðanin fleiri ferðir gjørt landsstýrið varugt við heimildarloysi, eins og løgtingsgrannskoðaramir eisini umrøddu henda spurning í seinasta álitinum. Tí hava løgtingsgrannskoðaramir sjálvir kannað hesi viðurskifti nærri.

Árini 1988 til 1990 hevur samlaða meirnýtslan hjá Strandfaraskipum landsins uttan heimild verið 33,1 mió.kr. ávikavist 7,7, 8 og 17,4 mió.kr. hesi árini. Í 1991 var meirnýtslan 5,4 mió.kr.

Upprunaliga játtanin á fíggjarlógini til Strandferðsluna, incl. tyrlutænastuna, var í 1988 góðar 55 mió.kr. Vísandi til gerðabók hjá fíggjarnevndini 14. september 1988, bað landsstýrið um eina eykajáttan til Strandfaraskip landsins upp á 2,4 mió. kr. fyri tíðarskeiðið 1. juli til 31. desember 1988 til rakstur vegna økta siglíng og flúgving sambært broyttu ferðaætlanina m.a. tí, at galdandi ferðaætlan ikki hóskaði til flúgvingina hjá Atlantic Airways. Umsóknin um hesa eykajáttan varð samtykt.

Sambært gerðabók hjá fíggjarnevndini 1. desember 1988 varð aftur biðið um eina eykajáttan fyri 1988 upp á 8 mió.kr. Víst varð í hesum sambandi til skriv dagf. 14. oktober 1988, har p/f Grannskoðaravirkið vegna Strandfaraskip landsins vísti á, at Strandfaraskipum landsins restaðu góðar 15 mió.kr. í fíggjarárinum 1988 fyri at kunna halda ta ferðaætlan, sum var áløgd stovninum at virka eftir.

Landsstýrismaðurin í samferðslumálum greiddi fíggjarnevndini frá, at síðani hetta skriv varð gjørt, hevur Strandferðslan úttalað yvir fyri landsstýrinum, at teir fóru at klára seg við 8 mió.kr. og at hetta var orsøkin til, at landsstýrið bert søkti um 8 mió.kr.

Fíggjarnevndin samtykti at geva hesa eykajáttan, og var á einum máli um, at allir spurningurin um virksemið og fíggjarliga støðið hjá strandferðsluni skal viðgerast soleiðis, at trygd fæst fyri, at virkast kann forsvarliga innan fyri teir fíggjarligu karmar, ið játtaðir eru.

Tá roknskapurin fyri 1988 var liðugur, vísti tað seg, at metingin hjá grannskoðaranum var røtt, og hóast omanfyrinevndu eykajáttanir, var ískalt talan um eina meirnýtslu upp á 7,7 mió.kr. fyri 1988.

Í 1989 var játtanin íalt 55,8 mió. kr. Hallið var 63,8 mió. kr., og sostatt var talan um eina meirnýtslu upp á 8 mió. kr. Landsstýrið søkti ikki fíggjarnevndina um nakra eykajáttan í 1989.

Í 1990 var játtanin til Strandferðsluna íalt 45,8 mió. kr. Roknskapurin vísti eitt hall upp á 63,2 mió. kr. Tað vil siga ein meirnýtsla upp á 17,4 mió. kr. Heldur ikki í 1990 søkti landsstýrið fíggjarnevndina um nakra eykajáttan.

Ultimo 1990 var sostatt talan um eina akkumuleraða meirnýtslu uttan játtan fyri tey 3 árini upp á 33,1 mió. kr.

Sambært grannskoðanarprotokollini er yvirnýtslan fíggjað við yvirtrekki av kassakredittum í peningastovnunum, henda lántøka var íalt ult. 1990 uml. 20 mió. kr. (Við lóg nr. 103 frá 17. desember 1991 fekk Strandfaraskip landsins lániheimild, upp til 10 mió. kr., til fígging av rakstrinum).

Til tess at bøta um gjaldføristørvin samtykti landsstýrið 14. mars 1989 at mæla til, at Strandfaraskip landsins fær ein fyribils kassakreditt upp á í mesta lagi 15 mió. kr. frá Gjaldstovuni, til endaligur roknskapur fyri 1988 fyriliggur.

Hesin roknskapur fyrilá longu 14. juli 1989.

Men ikki fyrr enn 2 ár seinni, 6. mei 1991, biður landsstýrið við skrivi til fíggjarnevndina um eykajáttan upp á omanfyri nevndu 33,1 mió. kr. til Strandfaraskip landsins.

Sambært gerðabók hjá fíggjarnevndini 7. juni 1991 kemur fram, at landsumsitingin fleiri ferðir uttan úrslit hevur heitt á skiftandi landsstýri um at leggja spurningin um eykajáttan til Strandferðsluna fyri fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin samtykti at játta 8 mió. kr. sum eykajáttan fyri 1989 og 17,4 mió. kr. fyri 1990. Samtundis varð tikið til eftirtektar, at tá løgtingið hevði góðkent roknskapin fyri Strandfaraskip landsins fyri 1988, var ikki neyðugt við eykajáttan hesum viðvíkjandi.

Játtanin til Strandfaraskip landsins og Tyrlutænastuna á fíggjarløgtingslógini fyri 1991 var 42 mió. kr. Á eykafíggjurløgtingslógini fyri 1991 varð givin ein eykajáttan upp á 7,9 mió. kr. Hóast hesa eykajáttan, var samlaða meirnýtslan í 1991 5,4 mió. kr.

**9. Tiltøk landsstýrisins at bøta um fíggjarstýringina:**

Á fundi 2. juni 1992 samtykti landsstýrið at seta ein arbeiðsbólk at gera uppskot um bygnaðarbroyting innan Strandfaraskip Landsins og Samferðslustovuna.

Í álitinum frá arbeiðsbólkinum, dagfest 18. november 1992, verður m.a. sagt í niðurstøðuni viðvíkjandi Strandfaraskipum Landsins:

"Bygnaðurin á Strandfaraskipum Landsins sýnist at vera ein leivd frá farnari tíð og als ikki í tráð við dagsins uppgávur.

Verandi bygnaður fyrikemur at hóska best til eitt minni reiðarí og ikki til eina tænastufyritøku, ið hevur 13 skip og ferjur, 2 tyrlur og 47 flutningsakfør, um-

framt 7 størri og 10 minni avgreiðslur kring landið og ein árligan umsetning upp á omanfyri 100 mió. kr.

Verandi bygnaður er tí eftir okkara meting hvørki egnaður til at menna SL sum eina tænastufyritøku ella at vera kamur um eina skilagóða fíggjarstýring.

Hjá einum stovni, sum fær kr. 50-70 mió. í almennum stuðuli árliga, má minsta kravið vera, at játtandi myndugleikin veit, hvat hesin peningur fer til, at hann verður umsitin á skynsamasta hátt.

Hóast vit hava tosað við allar ábyrgdarpersónar og beinleiðis spurt um hesi viðurskifti, hevur tað ikki eydnast at finna nakran á stovninum, sum kann sigast at hava ábyrgd ella útbúgving til at taka sær av nútímans fíggjarstýring.

Vegna manglandi vitan um nútímans fíggjarliga umsiting og stýring liggur hesin partur av leiðsluuppgávunum á SL beinleiðis í órøkt, og hevur leiðslan á ongan hátt livað upp til ábyrgdina. Tann vantandi fíggjarstýringin sæst týðiliga av, at fíggjarætlanir og roknskapir stórt sæð bert verða nýtt til at staðfesta eitt úrslit fyri farið tíðarskeið í staðin fyri at vera eitt stýringsamboð til leypandi at innrætta virksemið eftir broytingum í inntøkum og útreiðslum."

Viðvíkjandi Samferðslustovuni verður mett, at hesin stovnurin sær út til at hava greiða stýring á fíggjarviðurskiftunum hjá Bygdaleiðum.

Í tilmælinum frá arbeiðsbólkinum verður m.a. mælt til, at Samferðslustovan og Strandfaraskip Landsins mugu hava eina felags yvirordnaða leiðslu, og uppskot er gjørt til ein nýggjan bygnað fyri samferðsluøkið, herundir starvs- og endamálslýsingar. Somuleiðis er gjørt uppskot um nýggja reglugerð og uppskot til løgtingslóg um stovnan av partafeløgum, ið reka skulu flutningsvirksemi.

Á fundi við landsstýrismannin í samferðslumálum 26. november 1992 komu løgtingsgrannskoðararnir inn á spurningin, um tað er realistiskt, at Strandferðslan og Tyrludeildin kundu klára seg við eini játtan upp á 28 mió. kr., tá undirskotið í 1991 hevði verið heilar 55 mió. kr.

Landsstýrismaðurin metti, at hetta kundi lata seg gera við teimum bygnaðarbroytingum, ið gerast skuldu. Í hesum sambandi nevndi hann, at undirskotið hjá Smyrli skuldi burtur, Dúgvan skuldi gevast og hann metti, at raksturin av Tróndi fór at gerast betri, tá siglt varð til Gomlurætt. Somuleiðis nevndi hann, at fleiri av avgreiðslunum helst blivu niðurlagdar, og tað fór at koma betri skil á farmaflutningin, ið skuldi leggjast í eitt felag fyri seg, og óivað blivu farmagjøldini hækkað.

**10. Skálafjarðarsiglingin:**

Í sambandi við orðaskiftið um Skálafjarðarsiglingina meta løgtingsgrannskoðararnir, at orðaskiftið um hetta mál í nógvum førum ikki hevur verið sakligt. Tann 10. apríl 1992 gjørdu løgtingsgrannskoðararnir eina frágreiðing, ið varð býtt út til løgtingslimirnar:

"Løgtingið álegði í uppskoti til samtyktar, dagfest 24. apríl 1991, løgtingsgrannskoðarunum at "kanna tær skuldsetingar í løgtingsmáli nr. 61/1990 (vetrarting) í móti Strandfaraskipum landsins frá Lassa Klein, løgtingsmanni, og leggja úrslit av hesi kanning fyri Føroya Løgting á Ólavsøku 1991."

Byrjanin til hetta mál var, at Strandferðslan fyri at spara ætlaði at skerja Skálafjarðarsiglingina, og mett var, at 2,5 mió. kr. kundu sparast upp á ársbasis.

Í hesum sambandi gjørdi Lasse Klein ein faldara og setti fram uppskot til samtyktar tann 5. apríl 1991. Her verður gjørt vart við, at landsstýrið hevur tikið støðu til skerjingina av túratalinum hjá "Dúgvuni" út frá skeivum fortreytum. Sum prógv fyri hesum verður uppsettur ein alternativur rakstrarroknskapur fyri árið 1990. Í viðmerkingunum til uppskotið verður m.a. víst á, at: "meðan veruliga støðan byggir á eina inntøku upp á 12.594.854 kr., vísir roknskapurin hjá Strandfaraskipum Landsins eina inntøku upp á bert 5.590.126 kr. ella 6.644.728 kr. minni, enn hagtølini hjá M/F Dúgvuni vísa á."

Undir 1. viðgerðini verður gjørt vart við ymsar feilir, og 24. apríl má Lasse Klein gera eitt uppískoyti til tær upprunaligu viðmerkingarnar, har inntøkurnar verða lækkaðar knappar 2 mió.kr. til 10.738.411 kr.

**Niðurstøða:**

Løgtingsgrannskoðararnir hava kannað hetta mál gjølla, og niðurstøðan byggir á fleiri frágreiðingar og fundir um málið:

1. Løgtingsgrannskoðararnir hava frá roknskapargrannskoðanini fingið váttan fyri, at gjørdar eru kanningar, sum vísa, at allur kontantur peningur frá "Dúgvuni" er avroknaður og er bókaður á Strandferðsluni og inntøkuførdur hjá "Dúgvuni".
2. Løgtingsgrannskoðararnir hava gjørt eina nærri kanning av inntøkunum, sum Lasse Klein nýtir í sínari uppgerð.

   Út frá teim somu hagtølunum er úrslitið, at inntøkurnar av bilflutningi eru umleið 1 mió. kr. ov høgar vegna tess, at SL-bilarnir eisini verða tiknir við her, og meðalprísurin er settur til 80 kr. í staðin fyri 60 kr.

   Farmaflutningurin við SL-bilum verður bókaður á viðkomandi rutu á landi, og flutningur við skipi er innroknaður í samlaða farmagjaldið.

   Tí hevur Lasse Klein í sínari uppgerð mett, at teir 3600 SL-bilarnir, sum eru fluttir á rutuni, eiga at inntøkuførast til (fullan prís) 390 kr. pr. stk., ialt 1,4 mió. kr.

   Men Lasse Klein hevur í sínum roknskapi eisini inntøkuført farmagjøld upp á slakar 2,5 mió. kr., hóast farmurin verður fluttur í omanfyri nevndu SL-bilum.

   Lasse Klein hevur uttan at kanna grundarlagið nærri minkað útreiðslurnar við 8-900 t. kr.

Løgtingsgrannskoðararnir átala, at ein løgtingsmaður í einum løgtingsmáli ber fram so skeivur upplýsingar og harvið avlagar eitt skilagott og sakligt orðaskifti um hetta mál.

3. Løgtingsgrannskoðararnir meta, at tað er skeivt, at Strandfaraskip Landsins ger serroknskapir fyri skipini uttan at gera vart við, hvørji prinsipp og hvørjar fyritreytir eru galdandi fyri býti av inntøkum og útreiðslum. Rakstrarúrslitini fyri tær einkultu eindirnar mega við verandi skrásetingar- og bókingarskipan sigast ikki at vera nøktandi og kunnu sostatt ikki nýtast sum einsamalt grundarlag fyri avgerðum á samferðsluøkinum.
4. Løgtingsgrannskoðararnir meta, at orðaskiftið sum verið hevur á tingi í hesum máli, tíverri minst av øllum hevur snúð seg, um tað er rætt ella skeivt at skerja skálafjarðarsiglingina, og um tað er sannlíkt at spara 2,5 mió.kr. Hesin seinni spurningurin kann nú eitt ár aftan á svarast við einum fyrispurningi til Strandfaraskip Landsins/Føroya landsstýri.

**Viðmerkingar:**

Vísandi til omanfyri standandi verður átalað, at skiftandi landsstýri hava nýtt og lænt pening uttan heimild og ikki hava tikið stig til at bøta um teir grundleggjandi trupulleikarnar í sambandi við rakstur av Strandfaraskipum Landsins, hóast grannskoðanin í áravís hevur gjørt vart við hesi viðurskifti. Fegnast verður um, at stig nú eru tikin til at bøta um støðuna, men átalað verður, at virkað nú verður eftir eini reglugerð, ið ikki er lýst sambært lóg um almennt kunngerðarblað.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 4/3 1992: Grannskoðan av almennum roknskapum.*

## Uppskot

## til

## samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Útvarpi Føroya fyri fíggjarárini 1989, 1990 og 1991 við niðanfyristandandi viðmerkingum.

**Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:**

**1. Lógargrundarlag:**

ÚF er sett á stovn við Ll nr. 23 frá 28.3.1956 við broytingum í Ll nr. 28 frá 17.5.61, Ll nr. 22 frá 9.4.64 og Ll nr. 32 frá 27.5.68.

Arbeiðið hjá útvarpsnevndini er staðfest við Ll nr. 11 frá 14.2.57 við broytingum í Ll nr. 38 frá 25.5.63 og Ll nr. 25 frá 10.6.71, og reglugerð nr. 51 frá 18.7.57.

**2. Endamál:**

Sambært lóg nr. 23 frá 28.3.1956 hevur løgtingið einarætt til at hava útvarp í Føroyum og setir á stovn og rekir útvarpsstøð upp á 5 kw við heitinum Útvarp Føroya. Landsstýrið hevur sambært § 1, stk. 3 heimild at geva undantaksloyvi til royndarsendingar.

Sambært § 2, 1. stk. í reglugerð um starv útvarpsnevndarinnar, tekur útvarpsnevndin avgerð um, hvussu dagsskrá útvarpsins skal skipast í høvuðsevnum, og góðkennir hana, innan hon verður kunngjørd. Nevndin fyrisetir reglur, ið hon heldur vera neyðugar við tí endamáli, at tað, sum útvarpað verður, hevur fjølbroytt, mentunarligt og upplýsandi innihald, og at hugsunarfrælsi, rættsinni og javnaður móti øllum flokkum og stevnum í almennum málum, vinnustevnum, feløgum og einstøkum monnum skulu ráða í útvarpinum.

**3. Fíggjarviðurskifti:**

Sambært lóg nr. 23 frá 28.3.56 við seinni broytingum, setir landstýrið fyristøðumann, ið hevur dagliga stýri útvarpsins eftir reglugerð, ið landsstýrið fyrisetir. Landsstýrið setir starvsfólk eftir tilmæli fyristøðumansins. Lønirnar hjá fyristøðumanni og starvsfólki verða ásettar av landsstýrinum sambært § 2.

Smb. § 3 skal gjald rindast til útvarpið av hvørjum radiomóttakara í landinum. Landsstýrið fyrisetir gjaldið fyri eitt ár í senn eftir tilráðing fíggjarnevndarinnar.

Sambært § 5 í lógini ger fyristøðumaðurin uppskot til fíggjarætlan fyri fíggjarárið og sendir landsstýrinum uppskotið innan 1. januar. Fíggjarætlanin verður tikin sum serstakur liður í fíggjarlóg landsins. Inntøkur útvarpsins verða bert at nýta til útvarpsendamál.

Sambært § 6 í reglugerðini heitir landsstýrið á nevndina og fær ummæli viðvíkjandi setan av útvarpsstjóra og starvsfólki, sum hevur fyrireiking av útvarpstilfari um hendi ella luttekur í sjálvum útvarpingunum viðvíkjandi fíggjarætlan útvarpsins og støddina á útvarpsgjaldi.

Sambært § 2 hevur landsstýrið allan avgerðarrættin fyri øllum fíggjarligum útvarpinum viðvíkjandi.

Til tess at kunna løgtingið um ta fíggjarligu gongdina hjá Útvarpi Føroya er gjørdur ein samandráttur av ársroknskapum fyri 1989-1991: 4: Yvirlit yvir rakstur 1989-1991:

| **Inntøkur** | **1989** | **1990** | **1991** |
|---|---|---|---|
| Útvarpsgjald | 12.576 | 11.7181 | 3.951 |
| Kunngerðir | 4.766 | 4.394 | 4.508 |
| Kvøðuljómar | 113 | 113 | 125 |
| Rentur | 1.007 | 1.112 | 1.072 |
| Ymiskt | -94 | 100 | 131 |
| | 18.368 | 17.437 | 19.787 |
| Vinningur V-4 | 3.032 | 2.857 | 2.974 |
| | 21.400 | 20.294 | 22.761 |
| **Útreiðslur** | | | |
| Útvarpsstøðirnar og studio | 943 | 904 | 528 |
| Útreiðslur viðv. útvarping: | | | |
| lønir | 4.971 | 5.806 | 6.782 |
| samsýningar | 2.658 | 2.713 | 2.519 |
| annað | 2.171 | 2.208 | 3.105 |
| **Stjórnarútreiðslur:** | | | |
| lønir | 1.590 | 1.774 | 1.958 |
| annað | 2.373 | 2.298 | 2.630 |
| Útvarpsnevndin | 31 | 56 | 89 |
| Avskrivingar og avsetingar | 4.007 | 2.141 | 2.840 |
| Avskrivingar av eftirstøðum | 189 | 280 | 420 |
| Rentur incl. kurstap | 2.361 | 2.086 | 1.835 |
| | 21.294 | 20.266 | 22.706 |
| Úrslit V-4 | 3.032 | 2.857 | 2.974 |
| Úrslit útvarpsrakstur | -2.926 | -2.829 | -2.919 |
| Samlað úrslit | 106 | 28 | 55 |

**5. Yvirlit yvir gongd í fíggjarstøðuni 1989-1991:**

| **Aktiv** | **1989** | **1990** | **1991** |
|---|---|---|---|
| Innistandandi í peningsstovnum | 10.563 | 11.043 | 11.725 |
| Innistandandi, avsett til útbygging | 3.990 | 4.353 | 4.686 |
| **Skuldarar:** | | | |
| eftirstøður f.útvarpsgjald | 7.593 | 6.362 | 6.321 |
| aðrir skuldarar | 977 | 1.325 | 1.357 |
| Umferðarfæ | 23.123 | 23.083 | 24.089 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Útvarpshúsið og aðrar ognir | 16.758 | 15.036 | 14.418 |
| Støðisfæ | 16.758 | 15.036 | 14.418 |
| **Aktiv samanlagt:** | 39.881 | 38.119 | 38.507 |
| Passiv | | | |
| Ognarar | 1.695 | 1.778 | 1.892 |
| Millumrokning við landskassan | 4.631 | 4.631 | 4.631 |
| Lán | 12.759 | 10.887 | 9.970 |
| Fremmand fíggjan | 19.085 | 17.296 | 16.493 |
| **Eginogn:** | | | |
| saldo pr. 1.1. | 16.190 | 20.295 | 20.324 |
| avsett til Útvarpshús | 0 | 500 | 35 |
| avsett til umvæling | 500 | 0 | 800 |
| avsett til ymisk projekt | 0 | 0 | 800 |
| rakstraravlop | 106 | 28 | 55 |
| landskassastudningur | 4.000 | 0 | 0 |
| Eginfígging | 20.796 | 20.823 | 22.014 |
| Passiv samanlagt | 39.881 | 38.119 | 38.507 |

**6. Seinasta álit frá løgtingsgrannskoðarunum:**

Í seinasta áliti frá løgtingsgrannskoðarunum, dagfest 10. apríl 1990, viðvíkjandi roknskapum fyri árini 1987 og 1988 verður ikki gjørt vart við serlig viðurskifti.

**7. Roknskapargrannskoðarin/viðmerkingar:**

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið ársroknskapirnar og grannskoðanarprotokollirnar til tess at vissa seg um, at rætt er farið fram bókhaldsliga og roknskaparliga hjá stovninum.

Roknskapargrannskoðanin hevur ikki gjørt vart við serlig átaluverd viðurskifti. Í protokollini fyri 1991 ger grannskoðarin vart við, at Útvarpið av úrslitinum hevur lagt 800.000 kr. í grunn til umvæling av ventilatiónsanleggum og 800.000 kr. í grunn til ymisk projekt. Grannskoðarin metir, at tað er neyðugt við nærri reglum um, hvussu roknskaparligar avsetingar hjá almennum stovnum skulu gerast. Hann metir eisini, at tað er tørvur á at fáa eina fasta skipan fyri, hvussu almennir roknskapir skulu vera uppsettir.

Í 1989 fekk Útvarp Føroya 4.000.000 kr. yvir fíggjarlógina, í 1990 og 1991 fekk Útvarp Føroya onki yvir fíggjarlógina.

Løgtingsgrannskoðararnir hava heft seg við eina stóra niðurgongd í útvarpsgjaldinum í 1990, og at Útvarp Føroya hevur óvanliga nógv innistandandi í peningastovnunum, ultimo 1991 uml. 16,5 mió.kr.

Til tess at kunna seg nærri um ymisk viðurskifti, hava løgtingsgrannskoðararnir havt fund við útvarpsstjóran.

Á fundinum varð upplýst, at útvarpsgjaldið er ringt at umsita, og at tað alla tíðina er ein ávís frágongd av ymsum orsøkum. Í 1985-86 var eitt stór kanning gjørd, og viðførdi hetta einar 5-6.000 fleiri gjaldarar. Árini 87-90 var síðani fráfall, og tá gjaldið var óbroytt árini 85-90, viðførdi hetta lækkandi inntøkur frá útvarpsgjaldi. Í 1991 hækkaði gjaldið við 100 kr. til 800 kr., samstundis steðgaði fráfallið í skrásettum lurtarum.

Viðvíkjandi innistandandi varð upplýst, at hetta fyri ein stóran part er høgt rentað. Upplýst varð, at millum lánini er eitt sera dýrt KD lán, har rentan er 22%. Lánið var upptikið í 1982. Obligatiónsrestskuldin var upprunaliga 10 mió.kr., men eftir sum kursurin var so lágur, fingu teir bert 6 mió.kr. útgoldið. Hóast teir hava goldið 1,2 mió.kr. aftur um árið nú í 9 ár, íalt uml. 11 mió.kr., er skuldin bert fallin frá 6 mió.kr. til 5,917 mió.kr. og obligatiónsrestskuldin, sum liggur aftanfyri, er stórt sæð óbroytt.

Upplýst varð, at arbeitt varð við eini umfíggingarætlan, og kravdi hetta tøkan pening. Somuleiðis varð nevnt, at MVG-skipanin eisini kom at hava stóra ávirkan á gjaldføri Útvarpsins, eins og búskaparliga støðan í landinum óivað vildi økja um eftirstøðurnar soleiðis, at omanfyrinevnda innistandandi kom at minka munandi.

Ásetingin av útvarpsgjaldi er ikki í tráð við lógina við tað, at hetta í praksis er ógjørligt, eftir sum hvørt húsarhald í dag ofta hevur eini 4-5 smærri og størri lurtitól.

Praksis er, at hvørt húski skal gjalda 1 útvarpsgjald og harumframt skal 1 útvarpsgjald latast fyri bilradio. Politiska hugsanin hevur verið, at um so var, at fólk høvdu ráð at hava bil, høvdu tey eisini ráð at gjalda eitt eyka útvarpsgjald. Í Føroyum eru umleið 14 túsund húsarhald og av hesum rinda uml. 12.300 útvarpsgjald. Tað eru skrásett 8.600 bilradio. Útvarpið hevur í umleið 1 ár havt samstarv við bileftirlitið um at siga frá, um radio var í bilinum í samband sýn av bilum. Henda skipan hevur viðført eina tilgongd í gjøldum.

**Viðmerkingar:**

Mælt verður til at løgtingslóg um útvarp og reglugerð um starv útvarpsnevndarinnar verður endurskoðað og tillagað nútíðar viðurskiftunum, og tikið verður undir við, at ásettar verða nærri roknskaparreglur fyri almennar stovnar, herundir tilknýti til fíggjarlógina.

# Álit

# í

*løgtingsmáli nr. 4/4 1992: Grannskoðan av almennum roknskapum.*

# Uppskot

# til

# samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Telefonverki Føroya Løgtings fyri fíggjarárini 1.4.1985-1991 við niðanfyristandandi viðmerkingum.

**Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:**

**1. Lógargrundarlag v.m.:**

Telefonverk Føroya Løgtings er stovnur undir Føroya landsstýri og virkar eftir:

- lóg nr. 111 frá 30. mei 1927 um "Lov om telefoner paa Færøerne",
- løgtingslóg nr. 11 frá 24. september 1970 um "broyting í lóg um telefonir í Føroyum"
- løgtingslóg nr. 28 frá 22. mei 1969 um "áseting av telefongjøldum"
- kunngerð nr. 10 frá 18. februar 1987 "Reglugerð fyri Telefonverk Føroya Løgtings", og
- kunngerð nr. 85 frá 18. desember 1985 um "telefongjøld v.m.".

**2. Endamál:**

Sambært reglugerðini er Telefonverk Føroya løgtings stovnur undir Føroya landsstýri, sum hevur til endamáls:

1. at lúka landsins tørv á telefonsambandinum innanlendis og millum Føroyar og útheimin,
2. at vera tænastuveitandi stovnur og í so stóran mun sum gjørligt rikin út frá handilsligum sjónarmiðum,
3. at laga seg eftir menning samfelagsins og átaka sær virksemi, tá ið viðurskiftini tala fyri tí,
4. at hava samvinnu á breiðum grundarlagi við postverkið, gjaldstovuna og aðrar almennar stovnar.

**3. Fíggjarviðurskifti:**

Sambært reglugerðina fyri Telefonverkið (frá februar 1987) skal landsstýrið seta ein fíggjarstjóra, sum undir telefonverksstjóranum hevur ábyrgdina av fíggjardeild og fyrisiting telefonverksins.

Somuleiðis skal setast ein tekniskur stjóri, sum undir telefonverksstjóranum hevur ábyrgdina av teknisku útbygging og tekniska rakstri telefonverksins.

Landsstýrið ásetir talið á starvsfólki og skal í samráð við telefonverksstjóran seta reglur fyri fíggjardeild telefonverksins.

Útbyggingar-, fíggjar-, rakstrar- og íløguætlan fyri telefonverkið skal á hvørjum ári latast landsstýrinum til góðkenningar í seinasta lagi 1. juli.

Til tess at ráðgeva landsstýrinum um útbyggingarætlanir skal skipast ein teknisk nevnd við trimum limum, valdum av landsstýrinum.

Til tess at kunna løgtingið um ta fíggjarligu gongdina hjá telefonverkinum er gjørdur ein samandráttur av ársroknskapunum fyri tíðarskeiðið 1.4.1985-1991.

**4. Yvirlit yvir rakstur 1.4.1985-1991**

| | (9 mðr) | | | | | | (Mió.kr.) |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Inntøkur:** | **1985** | **1986** | **1987** | **1988** | **1989** | **1990** | **1991** |
| Telefonfelagagjøld | 11 | 20 | 20 | 21 | 22 | 24 | 25 |
| Samtaluinntøkur | 36 | 59 | 65 | 62 | 72 | 85 | 86 |
| Annað | 10 | 16 | 25 | 32 | 37 | 31 | 26 |
| | 57 | 95 | 110 | 115 | 131 | 140 | 137 |
| **Útreiðslur:** | | | | | | | |
| Nýtsla av vørum | 1 | - 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 3 |
| Tekniskur rakstur | 16 | 26 | 26 | 32 | 34 | 33 | 38 |
| Tlf.avgr-sertæn. | 2 | 3 | 4 | 6 | 6 | 6 | 6 |
| Fyrisiting | 4 | 5 | 5 | 7 | 8 | 10 | 12 |
| Eftirlønir | 1 | 1 | 2 | 2 | 3 | 3 | 3 |
| Avskrivingar | 10 | 14 | 17 | 22 | 27 | 31 | 26 |
| Óvanl.innt.netto | - | - | - | - | - | - | - 7 |
| Útr.áðrenn rentur | 34 | 48 | 55 | 70 | 79 | 84 | 81 |
| Rentuinnt.-kursvinn. | - 2 | - 1 | - 1 | - 15 | - 6 | - 5 | - 12 |
| Rentuútr. og kurst. | 31 | 34 | 30 | 30 | 28 | 39 | 30 |
| Útreiðslur falt | 63 | 81 | 84 | 85 | 101 | 118 | 99 |
| Úrslit | - 6 | + 14 | + 26 | + 30 | + 30 | + 22 | + 38 |
| Útgoldnar lønir | | | | 42 | 49 | 48 | 47 |

**5. Yvirlit yvir gongd í fíggjarstøðuni 1985-1991:**

(Mió.kr.)

| **Aktiv:** | **1985** | **1986** | **1987** | **1988** | **1989** | **1990** | **1991** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tøkur og bund.pen. | 1 | 17 | 17 | 15 | 1 | 7 | 21 |
| Skuldarar | 11 | 12 | 17 | 9 | 13 | 15 | 6 |
| Frammanu.gold.lønir | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 |
| Vørugoymsla | 7 | 7 | 9 | 12 | 13 | 13 | 14 |
| Partabrøv | - | - | - | - | - | 5 | 5 |
| Annleggsaktiv | 203 | 230 | 276 | 324 | 367 | 368 | 363 |
| Aktiv samanlagt | 223 | 267 | 320 | 361 | 395 | 409 | 410 |
| **Passiv:** | | | | | | | |
| Kassakredittur | 11 | 5 | 13 | 6 | 4 | 6 | 2 |
| Ognarar | 5 | 4 | 12 | 9 | 26 | 33 | 20 |
| Millumrokning P&T | 6 | 5 | 5 | 5 | 5 | - | - |
| Landskass. veðh.útr. | 9 | 9 | - | - | - | - | - |
| Íleggingargrunnur | 3 | 11 | 10 | 29 | 38 | 47 | 44 |
| Uttanlandslán | 246 | 276 | 296 | 299 | 279 | 258 | 241 |
| Skuld samanlagt | 280 | 310 | 336 | 348 | 352 | 344 | 307 |
| Eginogn | - 57 | - 43 | - 16 | 13 | 43 | 65 | 103 |
| Passiv samanlagt | 223 | 267 | 320 | 361 | 395 | 409 | 410 |

Tann størsta broytingin í fíggjarstøðuni er vøksturin í annlegsaktivum. Um avskrivingarnar verða lagdar aftrat, er talan um samlaðar íløgur uppá góðar 300 mió.kr. í tíðarskeiðnum 1985-1991, og í høvuðsheitum hevur talan verið um eginfígging.

**6. Seinasta álit frá løgtingsgrannskoðarunum:**

2. desember 1986 legði grannskoðanarnevndin seinast álit fyri tingið viðvíkjandi roknskapum hjá telefonverkinum fyri árini 1983/84 og 1984/85. Í hesum áliti verður álagt landsstýrinum at bera so í bandi, at vørugoymslan á TFL verður fullfíggjað uppgjørd. Løgtingsgrannskoðararnir gera vart við, at eisini í 82/83 hevur hetta verið ófullfíggjað.

Sum heild mettu løgtingsgrannskoðararnir, at tørvur var á betri fíggjarligari stýring av útreiðslunum hjá Telefonverkinum.

Eisini gera løgtingsgrannskoðararnir vart við, at fíggjarnevnd løgtingsins setti sum treyt fyri upptøku av nýggjum lánum, at fíggjarstjóri varð settur á Telefonverkinum. Hóast hetta er lántøka farin fram, uttan at henda treyt er uppfylt, og varð hetta álvarsliga átalað.

**7. Roknskapargrannskoðanin/viðmerkingar:**

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið ársroknskapirnar og grannskoðanarprotokollirnar til tess at vissa seg um, at rætt er farið fram bókhaldsliga og roknskaparliga hjá stovninum. Roknskapargrannskoðarin hevur øll árini gjørt vart við átaluverd viðurskifti:

Í 1985 ger grannskoðanin vart við, at vandi er fyri at áhaldandi samarbeiðstrupulleikar vilja minka um trygdina innan roknskaparøkið og fíggjarøkið á stovninum. Uppbýtið av kostnaði og rentum er ófullfíggjað partvíst av, at bókhaldið hevur verið beinleiðis ómannað eitt tíðarskeið um ársskiftið.

Innanvirkis eftirlitið er ov vánaligt eisini tí, at fíggjarætlanir og roknskaparrapporteringar ikki verða gjørdar eftir einari fastari skipan. Hetta førir við sær, at planleggingin og eftirlitið við nýtsluni á stovninum ikki virka nóg væl.

Stjórin kann ikki geva grannskoðanini eina váttan fyri, at ársroknskapurin eftir hansara sannføring er settur soleiðis upp, at hesin gevur eina rættvísandi mynd av fíggjarligu gongdini og støðu stovnsins, og at allar ognir og skyldir stovnsins eru tiknar við í roknskapinum.

Í 1986 ger grannskoðanin aftur vart við, at uppbýtið av kostnaði og rentum er ófullfíggjað, og at innanvirkis eftirlitið enn ikki er nóg gott. Fíggjarætlanir og roknskaparfrágreiðingar verða enn ikki gjørdar eftir einari fastari skipan.

Heldur ikki í 1986 kann stjórin geva grannskoðanini eina váttan fyri, at ársroknskapurin er rættur.

Í 1987 verður gjørt vart við somu viðurskifti sum í 1986. Í seinnu helvt av 1987 eru fíggjarætlanir og roknskaparfrágreiðingar gjørdar, men ikki eftir einari fastari skipan.

Grannskoðanin upplýsir, at í 1988 verður umsitingin væntandi munandi broytt og organisatiónin og serliga fíggjarumsitingin, herundir tilfarsumsitingin, verða meira tíðarhóskandi.

Stjórin váttar, at ársroknskapurin eftir hansara sannføring er settur soleiðis upp, at hesin gevur eina rættvísandi mynd av fíggjarligu gongdini og støðu stovnsins, og at allar ognir og skyldur stovnsins eru tiknar við í roknskapinum.

Í 1988 metir grannskoðanin, at innanvirkis eftirlitið á summum økjum hevur virkað betri. Goymslan er nú avbyrgd soleiðis, at registrering av inn- og útgangandi vørum er tryggari, men eftirlitsskipanin við fløgunum gevur ikki møguleikar fyri at staðfesta, hvørjar deildir eiga meirýtsluna viðvíkjandi íløgum, sum í 1988 er upp á 11 mió. kr.

Í EDV skipanini er torført at avstemma samlaða telefonfelagagjaldið við høvuðsbókhaldið.

Í 1989 var meiríløgan 31 mió. kr., og heldur ikki í 1989 var gjørligt at staðfesta, hvørjar deildir høvdu framt ov stórar íløgur.

Tað er framvegis torført at avstemma telefonfelagagjaldið við høvuðsbókhaldið.

Í 1990 hevur Telefonverkið keypt partabrøv í felagnum, sum átti bygningin, sum Telefonverkið heldur til í á Hálsi. Hetta felag verður rikið sum sjálvstøðugt partafelag, sum Telefonverkið leigar hølir frá.

Mannagongdirnar og innanhýsis eftirlitið hava ikki enn verið nóg tryggar í sambandi við eftirlitið við íløgum. Viðurskiftini tykjast batnað í 1991.

Øll starvsfólk hjá Telefonverkinum fáa fasta telefonfelagagjaldið fult ella partvís góðskrivað. Hetta gjaldið er 231 kr. fyri hvønn ársfjórðing. Harafturat fáa starvsfólk í leiðandi størvum eisini góðskriva 540 kr. av samtalunum fyri hvønn ársfjórðing.

Í reglugerðini fyri Telefonverki frá 1987 stendur m.a., at landsstýrið setir, eftir tilmæli frá telefonverksstjóranum, ein fíggjarstjóra og ein tekniskan stjóra. Grannskoðanin ger vart við, at fíggjarstjórin ikki er settur, og røkir forstjórin sostatt framhaldandi hesar uppgávur.

Í 1991 staðfestir grannskoðarin, at stýringin av íløgunum hjá TFL hevur verið neyvari og at ábøtur eru gjørdar við innanhýsis mannagongdunum og at hetta arbeiðið heldur fram.

Í sambandi við, at tíðargreiningarnar viðvíkjandi avstemman av einum av størstu ognaranum eru gjørdar í 1991, er staðfestur ein munur, sum ger, at 9,8 mió. kr. verða inntøkuførdar sum inntøkur. Ein avstemman av millumrokningini við Telegrafstøðina førir við sær, at inntøkuførdar verða 4,0 mió.kr. sum óvanligar inntøkur.

Viðvíkjandi rentuútreiðslunum er roknskaparprinsippið broytt soleiðis, at hesar verða tíðargreindar fyri fyrstu ferð. Hetta ger, at úrslitið verður 7,1 mió. kr. lægri, enn tað hevði verið, um sama prinsipp hevði verið nýtt sum árini frammanundan.

Roknskapargrannskoðarin mælir leiðsluni til at taka anleggskartotek í nýtslu. Sum er, verður bert kartotek ført yvir bilar v.m.

8. november 1991 gjørdi grannskoðarin eitt óvarnað kassaeftirlit. Hetta kundi ikki gjøgnumførast á nøktandi hátt, tí ov long tíð var gingin, síðani pengakonti vóru stemmaðar av. Nevnt verður, at ábøtur viðvíkjandi avstemman eru framdar.

Grannskoðarin hevur fyrr gjørt vart við, at tað ikki er gjørligt at gera nágreiniliga avstemman millum felagabókhaldið og høvuðsbókhaldið, og at tað tí hevur serliga stóran týdning, at mannagongdirnar eru greiðar og kendar og mælir til at gera ein bókling við skrivligum vegleiðingum fyri innanhýsis mannagongdir í heila tikið.

Grannskoðanin ger vart við, at í roknskapinum er eitt lán í CHF ført. Hetta lán er tikið til at gjalda millumbylgjusendaran við (løgtingsmál nr. 83/1987). Telefonverkið hevur bókað landsstýrið sum skuldara við somu upphædd sum restskuldin. Landskassin hevur ikki bókað nakað viðvíkjandi hesum láni.

Gjørt verður vart við, at í reglugerðini fyri Telefonverkið stendur, at talið á starvsfólkum verður sett av landsstýrinum. Normeringin í 1984 var 121. Ultimo 1991 starvaðust 149 fólk. Við starvsfólkunum á telegrafstøðini er talið 176.

Til tess at kunna seg nærri um nakrar av omanfyri nevndu spurningum hava løgtingsgrannskoðararnir havt fundir við umboð fyri leiðsluna á Telefonverkinum og landsstýrið, og harumframt hevur verið skrivligt samskifti um ymisk viðurskifti.

**8. Viðmerkingar.**

Átalað verður, at Telefonverkið við landsstýrisins góðkenning í sambandi við keyp av bygninginum á Hálsi keypti partabrøvini í felagnum, ið átti bygningin, til kurs 1000, vegna tess, at hesin keypsháttur var ein skattafyrimunur fyri seljaran, hóast Telefonverkið tískil fekk bygningin bíligari, og keypið tí kann sigast at vera í tráð við reglugerðina, har stovnurin so vítt gjørligt skal rekast út frá handilsligum sjónarmiðum.

Álagt verður landsstýrinum at taka stig til, at reglugerðin fyri Telefonverkið verður hildin:

**§ 2:** viðvíkjandi setan av fíggjarstjóra
**§ 3:** viðvíkjandi reglum fyri fíggjardeild telefonverksins
**§ 5:** viðvíkjandi val av tekniskari nevnd

og at landsstýrið gjøgnumgongur og góðkennir allar skipanir viðvíkjandi samsýning til starvsfólk fyri telefongjøld, nýtslu av egnum bili o.a.

Mælt verður landsstýrinum til at gera eina løgfrøðisliga meting av, um tað er í tráð við stýrisskipanarlógina, at virksemi telefonverksins (og hjá øðrum líknandi stovnum) ikki verður tikið við á fíggjarlógina.

# Álit

í

*løgtingsmáli nr. 4/5 1992: Grannskoðan av almennum roknskapum.*

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Sjónvarpi Føroya fyri fíggjarárini 1989, 1990 og 1991 við niðanfyristandandi viðmerkingum.

**Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:**

**1. Lógargruudarlag:**
Tað almcnna sjónvarpið varð sett á stovn sambært løgtingslóg nr. 77 frá 21. mei 1982.

Sambært § 6 í lógini varð lóg nr. 11 frá 14. februar 1957 um útvarpsnevnd og reglugerðin um starv útvarpsnevndarinnar tilsvarandi at galda fyri sjónvarpsnevndina.

**2. Endamál:**
Sambært § 1 í lógini hevur løgtingið einkarrætt til sjónvarpssendingar,, og setir á stovn Sjónvarp Føroya.

Sjónvarp Føroya hevur til endamáls at hava objektivan, sakligan og upplýsandi tíðindaflutning og sendingar annars, ið varðveita og fjálga um føroyska mentan, átrúnað og siðalæru.

**3. Fíggjarviðurskifti:**
Eftir tilmæli frá sjónvarpsnevndini setir landsstýrið, sambært § 2 í lógini, í starv ella loysir úr starvi fyristøðumanni, ið hevur dagligu leiðslu sjónvarpsins um hendi eftir reglugerð, ið landsstýrið fyrisetir.

Sambært § 4 skal til sjónvarpið rindast gjald av hvørjum sjónvarpsmóttakara í landinum og umborð í skipum, ið eru skrásett í Føroyum. Landsstýrið fyrisetir gjaldið fyri eitt ár í senn eftir tilráðing fíggjarnevndarinnar.

Sambært § 5 í lógini ger fyristøðumaðurin uppskot til góðkenningar til fíggjarætlan fyri fíggjarárið og sendir landsstýrinum uppskotið. Inntøkur sjónvarpsins verða bert at nýta til sjónvarpsendamál.

Í lógini um útvarpið er ásett, at fíggjarætlanin verður tikin við sum serstakur liður í fíggjarlóg landsins, men er hetta ikki tilsvarandi ásett í sjónvarpslógini.

Sambært § 3 hevur Telefonverk Føroya Løgtings sendinetið um hendi. Nýbyggjan verður fyrisitin av landsstýrinum og goldin av landskassanum. Raksturin verður borin av sjónvarpinum.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið um Sjónvarp Føroya ger landsstýrið vart við, at 23. apríl 1969 samtykti tingið lóg um toll av sjónvarpstólum, og at hesin

peningur óskerdur skal fara í grunn til byggjan av sjónvarpshúsi, og at peningur harumframt hevur verið avsettur á fíggjarløgtingslógum at fara í grunn til sjónvarpsútbygging.

Til tess at kunna um fíggjarligu gongdina hjá Sjónvarpi Føroya er gjørdur ein samandráttur av ársroknskapunum fyri 1989-91:

**4. Yvirlit yvir rakstur 1989-1991:**

| **Inntøkur:** | **1989** | **1990** | **1991** |
|---|---|---|---|
| Sjónvarpsgjald | 12.189 | 12.889 | 12.588 |
| Lýsingar | 447 | 1.291 | 2.207 |
| Sektarpeningur | 60 | 61 | 93 |
| Søla og leiga av sjónbondum | 168 | 160 | 226 |
| Inntøkur í alt | 12.864 | 14.401 | 15.114 |
| | | | |
| **Útreiðslur:** | | | |
| Sjónvarpsstøðirnar og studiið | 1.867 | 1.836 | 1.543 |
| Útreiðslur viðv. sendingum: | | | |
| lønir | 6.434 | 6.962 | 7.249 |
| samsýningar | 828 | 1.013 | 883 |
| annað | 2.741 | 2.487 | 2.752 |
| **Stjórnarútreiðslur:** | | | |
| lønir | 1.541 | 1.474 | 1.907 |
| annað | 2.635 | 2.880 | 2.088 |
| Sjónvarpsnevndin | 65 | 65 | 65 |
| Avskrivingar og avsetingar | 219 | – | 469 |
| Avskr. og -setingar av eftirstøðuun | 200 | 559 | 1.361 |
| Rentur | - 32 | - 17 | 60 |
| Útreiðslur í alt | 16.498 | 17.259 | 18.377 |
| Rakstrarhall | 3.634 | 2.858 | 3.233 |
| Landskassastudningur | 4.800 | 3.000 | 3.500 |
| Samlað úrslit | 1.166 | 142 | 237 |

**5. Yvirlit yvir gongd í fíggjarstøðuni 1989-1991:**

| **Aktiv:** | **1989** | **1990** | **1991** |
|---|---|---|---|
| Innistandandi í peningastovnum | 198 | 61 | 232 |
| Skuldarar: | | | |
| eftirstøður fyri sjónvarpsgjald | 4.341 | 5.502 | 3.892 |
| aðrir skuldarar | 369 | 31 | 59 |
| Umferðarfæ | 4.908 | 5.594 | 4.183 |
| | | | |
| Skitsa til sjónvarpshús | 23 | – | – |
| Rakstrargøgn | 269 | 269 | 0 |
| Støðisfæ | 292 | 269 | 0 |
| | | | |
| Aktiv samanlagt | 5.200 | 5.863 | 4.183 |
| | | | |
| **Passiv:** | | | |
| Ognarar | 1.874 | 3.083 | 2.437 |
| Lán Føroya landsstýri | 3.000 | 2.000 | 1.500 |
| Bankaskuld | 464 | 777 | 6 |
| Fremmand fíggjan | 5.338 | 5.860 | 3.943 |
| | | | |
| **Eginogn:** | | | |
| Saldo pr. 1.1. | - 1.306 | - 139 | 3 |
| Flutt frá rakstri | 1.167 | 142 | 237 |
| Eginfígging | - 139 | 3 | 240 |
| | | | |
| Passiv samanlagt | 5.200 | 5.863 | 4.183 |

**6. Seinasta álit frá løgtingsgranuskoðarunum:**

Í seinasta áliti frá løgtingsgrannskoðarunum viðvíkjandi roknskapunum hjá Sjónvarpi Føroya fyri árini 1987-88, dagfest 17. mars 1990, sóknaðust løgtingsgrannskoðararnir eftir eini meira fullfíggjaðari uppseting av rakstrarútreiðslum og fíggjarstøðu stovnsins í ársroknskapunum, við tað at ein partur av rakstrarútreiðslunum, teim teknisku íløgunum og keyp og leiga av fyribilshølum var fíggjað beinleiðis úr omanfyri nevndu grunnum.

Heitt varð á landsstýrið um at áleggja Sjónvarpi Føroya nýggjan roknskaparhátt, sum vísir veruliga fíggjarvirksemi stovnsins, og at syrgja fyri, at reglur fyri peninganýtslu úr grunnunum verða greiðar.

Í hesum sambandi gjørdi leiðsla sjónvarpsins vart við, at grunnarnir vóru partur av landskassaroknskapinum og bókførdir av Gjaldstovuni, og at roknskapur sjónvarpsins ikki í so máta var øðrvísi enn hjá øðrum stovnum, sum partvís høvdu fingið sítt íløguvirksemi og lán fíggjað úr serligum grunnum.

**7. Roknskapargrannskoðarin, viðmerkingar:**

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið ársroknskapirnar og grannskoðanarprotokollirnar til tess at vissa seg um, at rætt er farið fram bókhaldsliga og roknskaparliga hjá stovninum.

Roknskapargrannskoðarin ger øll árini vart við, at ongar fastar reglur eru fyri, um útgerð skal útreiðsluførast ella aktiverast og avskrivast, og hvussu tað, ið er aktiverað, skal avskrivast.

Grannskoðarin vísir á, at tey fyrstu árini vórðu allar íløgur aktiveraðar og avskrivaðar yvir raksturin seinni, men seinnu árini eru allar íløgur, sum Sjónvarp Føroya hevur goldið, útreiðsluførdar yvir raksturin. Harafturat kemur so, at tær íløgur, ið eru goldnar beinleiðis úr sjónvarpsgrunnunum, eru ikki við í roknskapunum fyri Sjónvarp Føroya.

Grannskoðarin mælir til eina fasta skipan fyri, hvussu almennir roknskapir, í hesum føri roknskapir sjónvarpsins, skulu verða uppsettir.

Grannskoðarin ger vart við, at eftirstøðurnar hava verið ein vaksandi trupulleiki, men tað arbeiði, sum er lagt í innkrevjingina síðani 1990, hevur gjørt, at eftirstøðurnar nú eru minkaðar.

Til tess at lýsa tað virksemi, ið fíggjað er úr omanfyrinevndu grunnum, hava løgtingsgrannskoðararnir gjørt eitt yvirlit yvir gongdina soleiðis, sum henda er lýst í landskassaroknskapunum síðani 1988:

*Grunnur til sjónvarpsútbygging:*

| | **1988** | **1989** | **1990** | **1991** |
|---|---|---|---|---|
| **Aktiv:** | | | | |
| Føroya Sparikassi | 773 | 843 | 915 | – |
| Norðoya Sparikassi | 382 | 416 | 452 | – |
| SVF-hús M.A. Winthersg. | – | 1.400 | 2.412 | 2.412 |
| Umbygging av do. | – | – | 2.143 | 2.425 |
| | 1.155 | 2.659 | 5.922 | 4.837 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Passiv:** | | | | |
| Saldo undanfarna ár | 8.333 | 1.155 | 9.259 | 11.366 |
| Løgtingsjáttan | 7.000 | 8.000 | 2.000 | 0 |
| Rentuinntøka | 156 | 104 | 107 | 97 |
| Flutt | - 14.300 | – | – | – |
| Brúkt | -34 | – | – | – |
| Keyp av sjónvarpsútg. | – | – | – | - 1.406 |
| Útgoldið til SVF | – | – | – | - 93 |
| Saldo við árslok | 1.155 | 9.259 | 11.366 | 9.964 |

*Sjónvarpsgrunnur (tollur)*

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Aktiv:** | | | | |
| SVF-sendistøðir | 2.159 | 2.159 | 2.284 | 2.159 |
| SVF-íløgur | 19.868 | 20.344 | 22.145 | 22.145 |
| SVF-hús M.A. Winthersg. | 4.466 | 4.466 | 4.466 | 4.466 |
| SVF-rakstrarútreiðslur | 746 | 746 | – | – |
| | 27.239 | 27.715 | 28.895 | 28.700 |
| **Passiv:** | | | | |
| Saldo undanfarna ár | 17.851 | 31.635 | 32.748 | 34.479 |
| Inngoldið | 2.638 | 1.917 | 1.731 | 1.281 |
| Flutt | 14.300 | – | – | – |
| Klaksvíkar sjónl.fel. | -386 | – | – | – |
| TFL | -2.768 | – | – | – |
| Útgoldið til SVF | – | - 58 | – | – |
| Saldo við árslok | 31.635 | 33.494 | 34.479 | 35.760 |

Vísandi til omanfyristandandi yvirlit, vórðu úr grunninum til sjónvarpsútbygging í 1989 og 1990 nýttar í alt uml. 4,6 mió. kr. í samband við SVF-hús í M.A. Winthersgøtu.

Úr "tollgrunninum" vórðu í 1989 og 1990 nýttar ialt uml. 2,3 mió. kr. til SVF-fløgur.

Í viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið fyri 1991 boðaði landsstýrið frá, at flestu landskassagrunnar verða avtiknir við tí fyri eyga at seta allar ætlaðar almennar rakstrar- og fløguútreiðslur beinleiðis á fíggjarlógina, og einki varð játtað í grunnin til sjónvarpsútbygging.

Við løgtingslóg nr. 33 frá 27. mars 1992 varð avtøkan av grunnunum staðfest við lóg.

Ímillum teir avtiknu grunnarnar vóru eisini omanfyrinevndu sjónvarpsgrunnar, og viðvíkjandi grunni til sjónvarpsútbygging stendur í lógini, at peningaogn

grunnsins verður útgoldin Sjónvarpi Føroya, áðrenn grunnurin verður avtikin. Talan var um uml. 1,5 mió. kr. íalt. Sjónvarpið hevur í 1992 við góðkenning landsstýrisins nýtt 1.406 t. kr. til keyp av sjónvarpsútgerð, og restin 93 t. kr. er flutt á konto hjá Sjónvarpi Føroya.

Avtøkan av sjónvarpsgrunnunum er eins og avtøkan av øllum hinum grunnunum bókað í landskassans roknskapi fyri 1991.

**Viðmerkingar:**

Mælt verður til at løgtingslóg um sjónvarp og reglugerð um starv sjónvarpsnevndarinnar verða endurskoðaðar og tillagaðar nútíðar viðurskiftunum, og tikið verður undir við, at ásettar verða nærri roknskaparreglur fyri almennar stovnar, her undir tilknýti til fíggjarlógina.

## Álit

í

*løgtingsmáli nr. 4/7 1992: Grannskoðan av almennum roknskapum.*

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Apoteksverkinum fyri fíggjarárini 1987-1991 við niðanfyristandandi viðmerkingum.

**Frágreiðing frá løgtingsgranuskoðarunum:**

**1. Lógargrundarlag:**
Apoteksverk Føroya er stovnur undir Føroya Landsstýri og virkar eftir:

- lóg nr. 104 frá 5. september 1988 um apoteksverkið og heilivág
- lóg nr. 54 frá 8. mei 1991 um broyting í løgtingslóg um apoteksverkið og heilivág
- kunngerð nr. 82 frá 11. august 1989 um heilivágsskrá
- kunngerð nr. 84 frá 11. august 1989 um dygd í heilivági
- kunngerð nr. 8 frá 8. mars 1991 um fyrimyndarreglur á heilivági
- kunngerð nr. 69 frá 26. juni 1991 um skrásetingarráð viðvíkjandi farmaceutiskum tilbúningi.

**2. Endamál:**
Sambært § 1 í løgtingslóg nr. 104 frá 5. september 1988, um apoteksverkið og heilivág, við seinni broytingum, er Apoteksverkið stovnur undir Føroya Landsstýri.

Sambært § 29 í lógini hevur bert apoteksverkið loyvi til at framleiða, flyta inn, flýggja út, hava á goymslu, handla við og pakka heilivág, um so er, at einki annað er ásett í lógini ella av reglum ásettum við heimild í lógini um apoteksverkið og heilivág.

Sambært § 35, 2. stk. í somu lóg er ikki loyvt at flyta inn, reka handil við ella flýggja út farmaseutiskan sertilbúning uttan so, at hann er upptikin í ta sertilbúningarskrá, ið skrásetingarráðið heldur.

Landsapotekarin kann, uttan mun til ásetingina í § 35, 2. stk., undir serligum umstøðum loyva innflyting, handli við og útflýggjan av ávísum farmaseutiskum sertilbúningi, tá ið sertilbúningurin er góðkendur í einum av Norðurlondunum.

Landsstýrið setir eitt skrásetingarráð, sum ger av mál viðvíkjandi skráseting av farmaseutiskum sertilbúningum. Skrásetingarráðið kann áseta fylgistreytirnar fyri skráseting.

Landsapotekarin hevur smb. § 50 eftirlit við, at lógin og ásetingarnar við heimild í lógini verða yvirhildnar.

**3. Fíggjarviðurskifti:**

Sambært lógina um apoteksverkið og heilivág, § 6, setir landsstýrið ein apotekara á hvørjum apoteki. Sambært § 8 skipar apotekarin fyri rakstrinum av apotekinum og hevur ábyrgd av, at virkið verður útint forsvarliga og samsvarandi galdandi ásetanum og givnum fyriskipanum.

Sambært § 9 ásetir landsstýrið reglur um heimildir og heiti til starvsfólk, sum starvast á apotekinum.

Landsstýrið ásetir, sambært § 9, reglur um virksemi hjá teim ymsu apotekseindunum og kann áseta reglur um rakstur teirra.

Sambært § 18 í lógini ásetir landsstýrið reglur fyri útroknan av søluprísi til brúkaran hjá apotekum, handkeypssølum, læknum og djóralæknum, á vørum sum eru tilskilaðar apotekum at selja.

Sambært § 22 eru Apoteksgrunnurin, landsapotekarin og apotekini ein búskaparlig eind, tó at tey hava hvør sín roknskap.

Fíggjarætlanaruppskot og gjaldsuppskot fyri apoteksverkið verða viðgjørd av landsapotekaranum og apotekarunum í felag og verða við fylgisviðmerkingum teirra send landsstýrinum.

Fíggjarætlanaruppskotið verður sent landsstýrinum á hvørjum ári í seinasta lagi til ta tíð, landsstýrið hevur ásett.

Apoteksgrunnurin eigur sambært § 23 vørugoymslurnar, innbúgvið og føstu ognirnar hjá apoteksverkinum. Grunnurin er undir landsstýrinum og hevur til endamáls at fíggja apoteksverkið, og avlopið frá apoteksrakstrinum fellur til apoteksgrunnin.

Sambært § 24 er landsstýrinum heimilað vegna apoteksgrunnin at taka tey lán, sum vørukeyp fastognarkeyp, bygging og umbygging til hvørja tíð krevja.

Til tess at kunna løgtingið um ta fíggjarligu gongdina er gjørdur ein samandráttur av ársroknskapunum:

**4. Yvirlit yvir rakstur 1987-1991:**

| **Inntøkur: (mió. kr.)** | **1987** | **1988** | **1989** | **1990** | **1991** |
|---|---|---|---|---|---|
| Søla - kontant | 16,0 | 17,8 | 18,6 | 19,8 | 22,2 |
| Søla - kredit | 32,7 | 47,9 | 58,7 | 58,5 | 75,9 |
| Avsláttur | 0,0 | 0,0 | 0,0 | - 1,8 | - 3,0 |
| Søla íalt | 48,7 | 65,7 | 77,3 | 76,5 | 95,1 |
| Vørunýtsla | 29,2 | 41,8 | 47,4 | 46,1 | 61,3 |
| **Bruttovinningur** | 19,5 | 23,8 | 29,9 | 30,4 | 33,8 |
| **Bruttovinningur** í % | 40,1% | 36,3% | 38,7% | 39,8% | 35,5% |
| Lønir | 11,2 | 12,4 | 13,3 | 14,5 | 14,8 |
| Rakstur av fastari ogn | 0,8 | 0,9 | 1,6 | 1,4 | 2,2 |
| Kostnaður | 2,6 | 3,2 | 3,0 | 4,1 | 4,9 |
| Landsapotekarin | 0,7 | 0,7 | 0,7 | 0,9 | 1,0 |
| Útreiðslur íalt | 15,3 | 17,2 | 18,6 | 20,9 | 22,9 |
| **Úrslit áðrenn rentur** | 4,2 | 6,6 | 11,3 | 9,5 | 10,9 |
| Rentur | 0,9 | 0,5 | 0,1 | 0,1 | 0,1 |
| **Úrslit áðrenn avskrivingar** | 3,3 | 6,1 | 11,2 | 9,4 | 10,8 |
| Avskrivingar | 1,0 | 1,2 | 1,9 | 2,5 | 3,0 |
| **Nettoúrslit** | 2,3 | 4,9 | 9,3 | 6,9 | 7,8 |

**5. Yvirlit yvir gongd í fíggjarstøðuni 1987-1991:**

| **Aktiv: (mió. kr.)** | **1987** | **1988** | **1989** | **1990** | **1991** |
|---|---|---|---|---|---|
| Kassa-, banka- og giro-peningur | 3,1 | 9,3 | 16,9 | 17,6 | 23,6 |
| Debitorar | 6,3 | 7,7 | 8,7 | 10,5 | 11,8 |
| Vørugoymsla | 9,4 | 8,4 | 10,6 | 12,6 | 13,4 |
| Innbúgv | 9,4 | 8,4 | 10,6 | 12,6 | 13,4 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Bilar | 0,1 | 0,1 | 0,1 | 0,1 | 0,1 |
| Fastar ognir | 8,4 | 8,3 | 8,5 | 9,9 | 9,7 |
| **Aktiv ialt** | 30,5 | 36,8 | 47,3 | 52,3 | 60,2 |
| **Passiv:** | | | | | |
| Kreditorar | 5,6 | 6,5 | 9,5 | 10,1 | 13,6 |
| **Millumrokn. við Apoteksgr.** | | | | | |
| Saldo primo | 21,7 | 24,9 | 30,3 | 37,8 | 42,2 |
| Rentur til grunnin | 0,9 | 1,0 | 1,2 | 1,5 | 1,6 |
| **Ársúrslit** | 2,3 | 4,9 | 9,3 | 6,9 | 7,8 |
| | 24,9 | 30,8 | 40,8 | 46,2 | 51,6 |
| Inngoldið í Apoteksgr. | 0,0 | 0,5 | 3,0 | 4,0 | 5,0 |
| **Saldo ultimo** | 24,9 | 30,3 | 37,8 | 42,2 | 46,6 |
| **Passiv ialt** | 30,5 | 36,8 | 47,3 | 52,3 | 60,2 |

**6. Íløguvirksemi árini 1987-1991:**

Í tíðarskeiðnum 1987 til 1991 eru gjørdar íløgur í bilar, innbúgv (serliga ETV) og bygningar fyri ialt uml. 8,8 mió. kr. Hesar íløgur eru býttar soleiðis:

| (Í 1.000 kr.) | 1987 | 1988 | 1989 | 1990 | 1991 | Ialt |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Innbúgv | 752 | 824 | 623 | 1.460 | 2,781 | 6.440 |
| Bilar | 0 | 0 | 147 | 0 | 0 | 147 |
| Føst ogn | 16 | 75 | 390 | 1.160 | 106 | 2.198 |
| Ialt | 768 | 899 | 1.160 | 3.071 | 2.887 | 8.785 |

**7. Seinasta álit frá løgtingsgrannskoðarunum:**

Í seinasta áliti frá løgtingsgrannskoðarunum, dagfest 14. mars 1988, viðvíkjandi roknskapinum hjá apoteksverkinum fyri árið 1986 varð m.a. staðfest, at trygd var fingin fyri, at peningaviðurskifti og skjalatilfar vóru kannað, og at roknskapur og fíggjarliga støða apoteksins var í lagi.

Eisini varð gjørt vart við, at prísirnir hjá apoteksverkinum eru neyvt tengdir at donsku prísásetanini og at føroyska apoteksverkið framhaldandi ikki hevur nakran sjálvstøðugan politikk viðvíkjandi prísi á heilivági.

Gjørt verður samstundis vart við, at fyritreytirnar fyri egnum príspolitikki nú eru um at verða til staðar. Blokkstuðulsskipanin er farin at virka, og danski staturin hevur ikki beinleiðis ávirkan á hesar prísir. Samstundis verður staðfest, at tá nýggja apotekslógin verður samtykt, kann ráðleggingarnevndin fyri apoteksverkið taka sjálvstøðugar avgerðir hesum viðvíkjandi.

Løgtingsgrannskoðararnir siga at enda í álitinum, at tá apoteksverkið nú fær nýggjar karmar at virka innanfyri, bæði við nýggjari apotekslóg og eini nýggjari samstarvsskipan við Danmark, eigur at verða farið varisliga fram við bygnaðarbroytingum á apoteksverkinum í aðrar mátar.

**8. Roknskapargrannskoðarin/viðmerkingar:**

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið ársroknskapirnar og grannskoðanarprotokollirnar til tess at vissa seg um, at rætt er farið fram bókhaldsliga og roknskaparliga hjá stovninum. Roknskapargrannskoðarin hevur ikki gjørt vart við átaluverd viðurskifti av týdningi.

Í 1987 ger grannskoðarin vart við, at landskassans útlegg í samband við byggjan av apoteksbygningi í Tórshavn pr. 31. desembor 1987 vísti eina saldo upp á uml. 2,5 mió. kr. Henda saldo kemur fram soleiðis:

| | |
|---|---|
| Saldo pr. 1. januar 1987 | t. kr. 2.209 |
| Útlegg fyri rentur og avdráttir av láni í p/f Sjóvinnubankanum | t. kr. 248 |
| Ialt | t. kr. 2.457 |

Tá likviditetur apoteksins nú var sera góður, varð hildið rímiligt, at apotekið byrjaði at afturgjalda útlegg landskassans.

Í 1988 varð inngoldið 500 t. kr. og í 1989 3 mió. kr. Harumframt hevur Apotekið í 1990 og 1991 inngoldið ávíkavist 4 og 5 mió. kr. í Apoteksgrunnin.

Í 1991 ger grannskoðarin vart við, at Apotekið hevur bundið seg við leigusáttmála frá 1. september 1991 við P/F C.C. Johansen, Tórshavn, at leiga bygning teirra í M.A. Winthersgøtu í 15 ár, og hereftir keypa bygningin fyri 100,00 kr. Samlaða leigu- og keypsupphæddin verður sostatt 2.700.100 kr.

**9. Apoteksgrunnurin:**

Í løgtingslóg nr. 14 frá 28. mars 1949 um apotek var í § 1 ásett, at apotek lata árligt gjald eftir reglum, sum landsstýrið ásetir. Gjaldið fer í føroyska apotekaragrunnin. Landsstýrið ásetir nærri reglur fyri henda grunn.

Í løgtingslóg nr. 63 frá 16. desember 1949 um apotekaragrunn o.a. varð í § 1 ásett, at tann í løgtingslóg nr. 14 av 28. mars 1949 § 1 og 6 nevndi apotekaragrunnur, eigur tað avlop, sum apoteksraksturin í Føroyum gevur, og hevur annars við landskassanum aftanfyri seg fíggjarliga ábyrgd av apotekinum (apotekunum).

og at apotekaragrunnurin annars verður at eiga tann pening, sum kann vera lutaður Føroyum út úr ríkisins apotekaragrunni, eins og grunnurin verður at eiga tær vørur á goymslu, ið apoteksraksturin á føroyskum hondum, eftir nærri ásetan, byrjar við, og tær føstu ognir, grunnurin keypir ella ognar sær.

Sambært § 2 skuldi landsstýrið áseta nærri reglur um apotekaragrunnin. Hesar reglur vórðu ásettar í reglugerð frá 16. juli 1956.

**Í § 6 í reglugerðini varð ásett:**

> *"Apotekaragrunnurin er stovnaður samsvarandi løgtingslóg 16. desember 1949, og Gjaldstovan førir serstakan roknskap fyri apotekaragrunnin, og hesin roknskapurin verður at grannskoða saman við landskassaroknskapinum. Peningur, sum grunnurin eigur, verður eftir landsstýrisins avgerð at seta í virðisbrøv ella í sparikassa til rentu, og hesin peningur kann ikki verða nýttur uttan eftir ávísan og samtykt frá landsstýrinum. Fyri nýtslu av fastognum til apoteksrakstur og fyri pening, sum stendur í vørum, skal raksturin av apotekinum svara 4% p.a. Landsverkfrøðingurin hevur eftirlit við byggingum apotekaragrunnsins".*

Løgtingslóg nr. 104 um apoteksverkið og heilivág kom í gildi 1. januar 1989, og sambært § 52, 2. stk. fóru omanfyrinevndu lógir frá 1949 úr gildi.

§ 1 í omanfyrinevndu løgtingslóg nr. 63 frá 16. desember 1949 um apotekaragrunn o.a. varð tikin við í broyttum líki í nýggju lógini í § 23.

§ 3 í lógini frá 1949 varð sett inn í nýggju lógina sum § 24.

Men § 2 í gomlu lógini, har nærri reglur um apotekaragrunnin verða at áseta av landsstýrinum, varð ikki tikin við í nýggju lógina.

Í roknskapunum fyri Apoteksverkið er roknað renta upp á 4% av allari eginognini, og er henda renta útreiðsluførd í apoteksroknskapunum og inntøkuførd í grunninum. T.d. var rentan til apotekaragrunnin í 1991 1,7 mió. kr. – Renturokningin er sostatt ikki heilt í tráð við ta gomlu reglugerðina, men vísandi til omanfyristandandi viðvíkjandi avtøku av lógunum frá 1949, má reglugerðin metast at vera farin úr gildi.

Fíggjarstøðan hjá apoteksgrunninum 31. desembcr 1991 var tann, at umframt millumrokningina (eginognina) við apotekini upp á 46,6 mió. kr. hevur grunnurin innistandandi í banka og sparikassa 9,9 mió. kr.

**10. Viðmerkingar:**

Sølan hjá Apoteksverkinum er nærum tvífaldað frá 1987 til 1991. Bruttovinningurin hevur ligið í millum 35 og 40%.

Løgtingsgrannskoðararnir hava heft seg við, at av kredittsøluni í 1991 upp á 75,9 mió. kr. fóru uml. 27,2 mió. kr. til aling, 26,2 mió. kr. til sjúkrakassar og 10 mió. kr. til sjúkrahús.

Kostnaðarstøðið í mun til søluna er minkað lutfalsliga, og úrslit áðrenn rentur og avskrivingar hava árini 1989-1991 ligið um 10-11 mió. kr. árliga.

Sambært ársroknskapin 1991 hevði apotekið sjálvt innistandandi góðar 20 mió. kr. Saman við teim 9,9 mió. kr., ið apoteksgrunnurin hevði innistandandi, var sostatt talan um ein uppsamlaðan likviditet upp á góðar 30 mió. kr. pr. 31.12.1991.

---

1. juli 1992 varð lýst kunngerð (nr. 113) um áseting av søluprísi og heilivági. Í hesum sambandi hevur landsapotekarin upplýst, at søluprísurin tá var lækkaður, serliga viðvíkjandi heilivági til sjúkrahús, hav- og landbúnað.

Upplýst er, at sølan í 1992 hevur verið umleið 105 mió. kr., harav umleið 35 mió. kr. til aling, har bruttovinningurin liggur um eini 25% í meðal.

Nettoúrslitið fyri Apoteksverkið í 1992 er ikki endaliga uppgjørt, men verður væntandi væl hægri enn í 1991.

---

Mælt verður landsstýrinum til at taka støðu til, nær nóg mikið av peningi er uppsamlaður í Apoteksgrunninum og hvat ætlanin er, at hesin peningur skal brúkast til, og somuleiðis verður mælt til at áseta, hvussu stórt samlað árligt nettoúrslit Apoteksverkið framyvir skal miða ímóti, og at renturokningin til Apoteksgrunnin verður endurskoðað.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 4/8 1992: Grannskoðan av almennum roknskapum.*

## Uppskot

## til

## samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Postverki Føroya fyri fíggjarárini 1989-91.

**Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:**

**1. Lógargrundarlag:**

Postverk Føroya er stovnur undir Føroya Landsstýri og virkar eftir:

- lóg nr. 17 frá 31. mars 1976 um Postverk Føroya,
- lóg nr. 113 frá 22. desember 1989 um broyting í løgtingslóg um Postverk Føroya,
- lóg nr. 45 frá 9. mei 1976 um starvsfólkaviðurskiftini hjá postverkinum,
- kunngerð nr. 78 frá 22. juli 1987 um posttakstir á bløðum, og
- kunngerð nr. 143 frá 17. desember 1990 um posttakstir.

**2. Endamál:**

Postverk Føroya hevur, sambært løgtingslóg nr. 17 frá 31. mars 1976 um Postverk Føroya við seinni broytingum, til endamáls:

1. at lúka landsins tørv á post- og peningaflutningi innanlendis og millum Føroya og útheimin.
2. at vera tænastuveitandi stovnur og í so stóran mun sum gjørligt rikin út frá handilsligum sjónarmiðu,
3. at laga seg eftir menning samfelagsins og átaka sær víðkað virksemi, tá ið viðurskiftini tala fyri tí,
4. at hava samvinnu á breiðum grundarlag við Strandferðsluna, Telefonverkið, Gjaldstovuna og aðrar almennar stovnar.

**3. Fíggjarviðurskifti:**

Sambært løgtingslóg nr. 17 frá 31. mars 1976 um Postverk Føroya, er tað landsstýrið, sum ásetir talið á starvsfólki. Starvsfólkið verður lønt og starvast eftir reglum, settar av landsstýrinum, har ikki lógarreglur eru (§ 2, 4. stk.).

Allar ætlanir um útbygging, umskipan og nýskipan av postverkinum verða gjørdar av postverkinum í samráð við landsstýrið og skulu góðkennast av landsstýrinum, áðrenn tær verða settar í verk (§ 3, 1. stk.)

Postverkið kann sum stovnur taka upp lán, tó treytað av landsstýrisins og fíggjarnevndarinnar góðkenning (§ 4).

Fíggjar, rakstrar- og íløguætlan fyri postverkið verður løgd á hvørjum ári og skal latast landsstýrinum í seinasta lagi 15. november (§ 5, 2. stk.).

---

Til tess at kunna løgtingið um ta fíggjarligu gongdina hjá postverkinum, er gjørdur ein samandráttur av ársroknskapunum:

## 4. Yvirlit yvir rakstur 1989-1991:

| **Inntøkur: (mió.kr.)** | **1989** | **1990** | **1991** |
|---|---|---|---|
| Rakstrarinntøkur | 60,4 | 55,3 | 57,2 |
| Frímerkjadeildin, netto | 5,8 | 5,9 | 5,9 |
| Rentuinntøkur, netto | 3,4 | 3,9 | 2,5 |
| | 69,6 | 65,1 | 65,6 |
| **Útreiðslur:** | | | |
| Lønir, excl. Frímerkjadeildin | 63,6 | 64,4 | 61,0 |
| Postflutningur | 3,2 | 3,7 | 2,9 |
| Skrivstovuhald | 1,6 | 2,3 | 2,6 |
| Rakstur, leiga og viðlíkah.av bygningum | 4,5 | 5,5 | 3,7 |
| Rakstur av akførum | 1,9 | 1,6 | 1,7 |
| Keyp akfør og rakstrargøgn | 1,3 | 1,1 | 1,4 |
| Aðrar útreiðslur | 1,4 | 1,9 | 1,5 |
| Keyp av edv-tólum | 1,1 | 2,1 | 2,2 |
| | 78,6 | 82,6 | 77,0 |
| Úrslit áðrenn avskrivingar | 9,0 | 17,5 | 11,4 |
| Avskrivingar | 1,5 | 1,5 | 1,5 |
| Hall | 10,5 | 19,0 | 12,9 |
| Játtan á fíggjarlóginí | 3,0 | 3,0 | 15,0 |
| Eykajáttan | 0,0 | 14,0 | 0,0 |
| Játtan íalt | 3,0 | 17,0 | 15,0 |

**Samlaðar lønarútgjaldingar:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Útgoldnar lønir Postverkið | 63,6 | 64,4 | 61,0 |
| Útgoldnar lønir Frímerkjadeildin | 13,4 | 12,9 | 12,4 |
| Útgoldnar lønir íalt | 77,0 | 77,3 | 73,45 |

**Yvirlit yvir gongd í fíggjarstøðuni 1989-1991:**

| **Aktiv: (mió.kr.)** | **1989** | **1990** | **1991** |
|---|---|---|---|
| Kassa- og bankapeningur | 89,1 | 89,6 | 74,8 |
| Eykajáttan | 0,0 | 14,0 | 0,0 |
| Innistandandi á giro | -46,3 | -47,5 | -36,7 |
| Bankaskuld og onnur skuld | -44,8 | -57,1 | -37,8 |
| Tøkur peningur íalt | -2,0 | -1,0 | 0,3 |
| Lán til starvsfólkið | 0,5 | 0,4 | 0,4 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Onnur lán | 0,9 | 3,6 | 3,6 |
| Til góðar hjá P&T | 3,8 | 0,5 | 0,4 |
| Ikki goldið avísgjald | 0,6 | 0,8 | 0,8 |
| Aðrir skuldarar | 0,2 | 0,7 | 0,8 |
| Bygningar og grundøki | 15,0 | 13,5 | 14,3 |
| Aktiv íalt | 19,0 | 18,5 | 20,6 |
| **Passiv:** | | | |
| Skuld fyri postflutning | 0,3 | 0,0 | 0,0 |
| Skyldugur kostnaður | 0,5 | 2,4 | 2,4 |
| Skuld til jólamerkjagrunnin | 0,7 | 0,6 | 0,6 |
| Stuttfreistað skuld íalt | 1,5 | 3,0 | 3,0 |
| Byggi- og rakstrargrunnur postverksins | 17,5 | 15,5 | 17,6 |
| Passiv íalt | 19,0 | 18,5 | 20,6 |

**Játtanir á fíggjarlógini verða bókaðar beinleiðis á eginognina.**

**6. Seinasta álit frá løgtingsgrannskoðarunum:**

Í seinasta áliti frá løgtingsgrannskoðarunum, dagfest 10. apríl 1990, viðvíkjandi roknskapunum fyri árini 1987 og 1988 varð staðfest, at trygd var fingin fyri, at peningaviðurskifti og skjalatilfar vóru kannað og at roknskapur og fíggjarliga støða postverksins var í lagi.

Løgtingsgrannskoðararnir staðfesta eisini, at afturgongdin í føroyskari frímerkjasølu hevur gjørt grundarlagið og ætlan løgtingsins og landsstýrisins at miðspjaða frímerkjaarbeiðið veikari, og at afturvendandi kravið um miðspjaðing tí enn ikki er gingið á møti av Postverkinum.

**7. Roknskapargrannskoðarin/viðmerkingar:**

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið ársroknskapirnar og grannskoðanarprotokollirnar til tess at vissa seg um, at rætt er farið fram bókhaldsliga og roknskaparliga hjá stovninum.

Grannskoðarin hevur gjøgnumgingið arbeiðsgongd og innanhýsis eftirlit á Girostovuni og á edv-økinum. Í hesum sambandi eru tvær frágreiðingar sendar Postverkinum við áheitan um smávegis broytingar í arbeiðsgongdini.

Samanumtikið metir grannskoðarin tó, at innanhýsis eftirlitið á nevndu økjum er í lagi.

Viðvíkjandi postinum "Onnur lán" kr. 3.605.400 verður gjørt vart við, at posturin er samansettur av trimum upphæddum:

| | | |
|---|---|---|
| Forútgoldin húsaleiga til P/F IDE-Møblar ..... | kr. | 200.000 |
| Lán til P/F IDE-Møblar- ..... | kr. | 2.500.000 |
| Útgoldið vegna P/F Bláhamar- ..... | kr. | 905.400 |
| | kr. | 3.605.400 |

Viðvíkjandi forútgoldnari leigu og láni til Ide-Møblar er Postverkið av teirri áskoðan, at BRF hevur yvirtikið hesa skuld eftir at hava keypt Ide-húsið á tvingsilssølu. Grannskoðarin hevur ikki fingið váttan fyri, at BRF viðurkennir hesi krøv.

Viðvíkjandi áognini hjá P/F Bláhamar er rættarsak um málið. Postverkið hevur stevnt P/F Bláhamar, men felagið viðurkennir ikki kravið, men krevur endurgjald fyri avtalubrot.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 4/9 1992: Grannskoðan av almennum roknskapum.*

## Uppskot

## til

## samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapin hjá Føroya Ídnaðargrunni fyri fíggjarárið 1991.

**Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:**

Í seinasta áliti, dagfest 26. februar 1992, heftu løgtingsgrannskoðararnir seg m.a. við, at eginognin hjá grunninum í 1990 var minkað við 17 mió. kr. til uml. 35 mió. kr., og at eftirstøðurnar vóru vaksnar til knappar 50 mió. kr. Um so var, at ein eins lítil partur og higartil av rentum og avdráttum kom inn, kundi grunnurin skjótt koma í gjaldføristrupulleikar.

Sambært ársroknskapin fyri 1991 er eginognin minkað við 18 mió. kr. til 17 mió. kr. og eftirstøðurnar eru vaksnar til knappar 60 mió. kr.

Útlánini hjá grunninum eru 163 mió. kr., 40 mió. kr. eru avsettar móti tapi. Grunnurin skyldar Íløgugrunni Ídnaðarins og Oljugrunninum falt 40 mió. kr. og Íleggingargrunninum fyri Føroyar 103 mió. kr., harav 10 mió. kr. eru falnar til gjaldingar.

Uttanlandslánini, sum landskassin veðheldur fyri, eru 88 mió. kr., uppgjørd til kursvirði.

Grunnurin hevur 53 mió. kr. innistandandi í peningastovnunum.

Í átekningini, dagfest 23. mars 1992, ger grannskoðarin vart við, at avsetingarnar bert eru nóg stórar, um tað eydnast at rætta ta búskaparligu gongdina í Føroyum

Eftir sum henda fyritreyt neyvan er uppfylt, má metast, at fíggjarliga støða grunnsins er munandi versnað.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 4/10 1992: Grannskoðan av almennum roknskapum.*

## Uppskot

## til

## samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapin hjá Føroya Jarðarráð fyri fíggjarárið 1991.

**Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðaruuum:**

Føroya Jarðarráð hevur tríggjar høvuðsuppgávur:

- fyrisiting av landsjørðini
- umsiting av jarðargrunninum
- umsiting av studningsskipanum

Fíggjarliga grundarlagið undir virki ráðsins eru játtanir á fíggjarlógini og søla av jørð:

- studningur til jarðargrunnin (íløgu- og rentustudningur),
- ymsir studningar, ið ráðið umsitur
- søla av festijørð.

Niðanfyri eru vístar tær upphæddirnar í 1991, ið jarðarráðið hevur fingið ávíst úr landskassanum til jarðargrunnin og til tær ymsu studningsskipanirnar, umframt inntøkurnar fyri sølu av jørð v.m.:

| **Studningar:** | **(mió.kr.)** |
|---|---|
| – Íløgustudningur | 3,5 |
| – Rentustudningur | 1,0 |
| – Til grunnin | 4,5 |
| – Neytahald | 12,5 |
| – Kjøt/egg | 2,8 |
| – Stráfóður | 1,3 |
| – Nýdyrkan | 2,5 |
| – Húsdjóraaling | 0,2 |
| – Súrhoyggjabrunnar | 0,3 |
| – Studningur íalt | 24,1 |
| – Søla jørð v.m. | 7,6 |
| **Samanlagt** | 31,7 |

**Útlánini pr. 31.12.1991 kunnu útgreinast til hesi endamál:**

| | **(mió.kr.)** |
|---|---|
| – Fjós | 82 |
| – Seyðahús | 11 |
| – Mjólkarvirki | 11 |
| – Traktorar og maskinur | 10 |
| – Sethús | 6 |
| – Kommunur | 8 |
| – Vakstrarhús | 5 |
| – Rakstrarlán | 3 |
| – Grísagarðurin | 3 |
| – Onnur lán | 4 |
| **Samanlagt** | 143 |
| Falnir avdráttir og rentur | 12 |
| | 155 |

Falnir avdráttir og rentur eru sambært ársroknskapin 1991 umleið 12 mió. kr., men lánini fella til gjaldingar 1.12., og fleiri lántakarar hava avtalur um mótrokning í útgoldnum studningi. Í seinasta áliti frá løgtingsgrannskoðarunum, dagfest 2. aprfl 1992, varð mett, at einar 15 mió.kr. av útlánunum pr. 31.12.1990 ikki komu innaftur vegna ikki-rentablar íløgur, serliga til fjós/mjólkarframleiðslu. Ongar avsetingar móti skuldaratapi verða gjørdar í roknskapinum.

Eftir sum fíggjarliga støðan hjá landbúnaðinum er versnandi, má metast, at vandin fyri munandi størri skuldaratapi er øktur.

# Álit

# í

*løgtingsmáli nr. 4/11 1992: Grannskoðan av almennum roknskapum.*

# Uppskot

# til

# samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapin hjá Vakstrarhúsgrunninum fyri fíggjarárið 1991.

**Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:**

Sum nevnt í seinasta áliti frá løgtingsgrannskoðarunum, dagfest 2. apríl 1992, er vakstrargrunnurin ikki stovnsettur við lóg, men landsstýrið gjørdi í november 1985 eina innanhýsis reglugerð fyri grunnin, og grunnurin verður fyrisitin av Føroya Jarðarráð.

Játtanin til grunnin á fíggjarlógini fyri 1991 var 800 t.kr. Útlánini pr. 31.12.1991 eru uml. 4 mió. kr. og grunnurin hevur uml. 3,2 mió. kr. innistandandi í peningastovni.

Av tí samlaða útlænta peninginum upp á 4 mió. kr. pr. 31.12.1991, eru eftirstøðurnar 1 mió. kr. Størsti parturin av útlánunum eru til eitt vakstrarhús, ið ikki ber seg, og roknast má við, at grunnurin missir meginpartin av hesum útláni. Ongar avsetingar móti skuldartapi verða gjørdar í roknskapinum.

Í seinasta áliti mæltu løgtingsgrannskoðararnir til, at umhugsað verður at avtaka grunnin vegna væntandi fíggjarligt grundarlag fyri fleiri vakstrarhúsum.

# Álit

# í

*løgtingsmáli nr. 4/12 1992: Grannskoðan av almennum roknskapum.*

# Uppskot

# til

# samtyktar

**Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Íleggingargrunninum fyri Føroyar fyri fíggjarárið 1991.**

**Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:**

Íleggingargrunnurin fyri Føroyar er tann fyrrverandi "Investeringsfond for Færøerne" (60-miliónagrunnurin), sum varð stovnaður við ríkislóg nr. 28/1964 og yvirtikin av heimastýrinum í 1976.

Í seinasta áliti frá løgtingsgrannskoðarunum varð mælt landsstýrinum til at velja sínar limir í stýrið, sum ikki hevði verið saman í 1991, og at reglugerð og endamál við grunninum varð endurskoðað.

Landsstýrið hevur valt sínar limir og 20. oktober 1992 var kunngerð (nr. 148) um virksemið lýst. Endamálsorðingin er víðkað til eisini at umfata lán til fíggjarstovnar.

Sambært roknskapin fyri 1991 er eginognin minkað úr 560 til 534 mió. kr. Grunnurin hevði innistandandi í peningastovnum 237 mió.kr., og hevði ískt útistandandi 367 mió. kr. í lánum, har teir størstu lántakararnir eru SEV, Føroya Ídnaðargrunnur og Telefonverkið við ávikavist 212 mió., 93 mió. og 44 mió. kr.

Rentuinntøkurnar eru nakað vaksnar í mun til 1990, men í ársroknskapinum eru heilar 70 mió. kr. avsettar móti skuldaratapi, og er hetta orsøkin til, at eginognin hjá grunninum er fallin.

# 5. Broyting í løgtingslóg um íløgugrunn til eisini at galda umvælingar og viðlíkahald

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at broyta reglumar fyri útgjalding av avsetingum í íløgugrunn og leggja fyri løgtingið uppskot um lógarbroyting, so at goldið kann verða úr grunnunum eisini til umvælingar og viðlíkahald.

**Viðmerkingar:**

Løgtingslóg um íløgugrunnar nr. 50 frá 23. december 1971, við scinni broytingum hevur verið nógv nýtt bæði av partafeløgum og privatum.

Lógin hevur á tann hátt verið við til at økt um samansparingina her á landi umframt at stuðla nakað av tí virksemi, sum í dag fyri ein stóran part má sigast vera uppsteðgað.

Føroya Gjaldstova upplýsir, at samlaða upphæddin, ið avsett er til íløgugrunnar, nú er 186,9 mió. kr., sum standa í hesum peningastovnum:

| | | |
|---|---|---|
| Føroya Sparikassa: | 14,5 mió. | (á bók) |
| Sjóvinnubankanum: | 53,7 " | (á bók) |
| Føroya Banka: | 55,5 " | (á bók) |
| Húsalánsgrunnurin og Ídnaðargrunnurin | 47,9 " | (lán) |
| Landskassanum: | 15,1 " | (skuld) |

Óvist er, um nakað av hesi samansparing hevur verið sett í Norðoya Sparikassa ella Suðuroyar Sparikassa.

Í 1991 vórðu avsettar til íløgugrunnar 31,4 mió. kr. móti 35,9 mió. kr. í 1990.

Partafeløg kunnu seta 35% av árligum yvirskoti og privat 20%, tó í minsta lagi 5.000 kr. av í grunn at nýta til nýggjar fløgur í bygningar, tól, v.m.

Peningurin skal standa á bundnari konto í Føroya Gjaldstovu til 5% p.a., og rentan er skattafrí. Avsetingin skal verða brúkt, áðrenn 10 ár eru liðin frá avsetingarárinum.

Er avsetingin ikki brúkt, áðrenn freistin er úti, kann henda verða longd nakað, ella avsetta upphæddin við rentum verður løgd sum inntøka til tað árið, freistin rennur út.

Vit hava stórt arbeiðsloysi, serliga í bygdavinnuni, og fá eru tey í tali, sum hætta sær at fara undir nýggjar íløgur, sum tíðirnar eru. Fólk mugu halda seg til umvælingar og viðlíkahald. Tað hevði stuðlað hesum arbeiði, ið neyðugt er, um avsetingarnar til íløgugrunnar kunnu verða goldnar út eisini til at væla um og halda viðlíka.

Tað hevði verið ein roynd at minka um arbeiðsloysið, ið nívir so hart.

### Álit

### í

*løgtingsmáli nr. 5/1992: Broyting í løgtingslóg um íløgugrunn til eisini at galda umvælingar og viðlíkahald.*

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 26. august 1992 og eftir 1. viðgerð 31. august 1992 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram og vísir annars til álit í løgtingsmáli nr. 39/1992: Broyting í løgtingslóg um íløgugrunnar.

# 6. Víðari framferð í undirgrundarmálinum

### Uppskot

### til

### samtyktar

Álagt verður landsstýrinum áðrenn veturnætur í ár at kunna løgtingið um allar tær avtalur, ið gjørdar eru viðvíkjandi undirgrund okkara.

**Viðmerkingar:**

Í 1975 samtykti løgtingið at yvirtaka málsøkið Undirgrund Føroya og havbotn sum føroyskt sermál.

Løgtingið tók í hesi somu samtykt til eftirtektar, at landsstýrið hevði havt samráðingar við donsku ríkisstjórnina um hesa yvirtøku, og álegdi landsstýrinum at halda fram við hesum samráðingum hagar, til málið varð greitt.

Tey árini, Tjóðveldisflokkurin hevur verið við í samgongu, hevur alla tíðina verið strongt á at fáa hesi rættindi okkara til høldar, og hava ymsir útvegir verið royndir í so máta. Ongantíð hava vit givið skarvin yvír og játtað dønum einsamøllum ella øðrum nakrar sømdir í sambandi við fyrireikandi kanningar, rannsóknir ella beinleiðis vinnu burtur úr møguligum ríkidømi.

Áðrenn sitandi samgonga tók við, høvdu føroyingar mótvegis dønum vunnið alt tað løgfrøðiliga og fólkarættarliga stríðið, sum uppi hevði verið partanna millum. Danir ásannaðu støðuna og vórðu gingnir við til at samráðast um eina yvirtøku til sermál, har løgtingið sjálvsagt fekk allan lóggávurættin júst soleiðis, sum løgtingið hevði samtykt, at tað skuldi vera.

Heimildir landsstýrisins vóru soleiðis púra greiðar. Samráðast skuldi um eina yvirtøku til sermál og einki annað.

Vísandi til hjáløgdu brot úr seinastu 8 løgmansrøðunum (skjal 1), so skilst, at syndarliga lítið spyrst burtur úr at nýta tol og siðiligar samráðingar, so sum tað sømir seg framkomnum og mentaðum tjóðum.

Greitt er, at danir, samstundis sum teir úti í heimi erpa sær av at fáa heiðurstekin fyri og eru undangongumenn til at tala frælsisins søk fyri øðrum tjóðum, roynast sannir hjálandaharrar í víðastu merking, tá ið tað gagnar egnum áhugamálum. Harafturat kemur, at løgmaður í røðum sínum tigur um og heldur hondina yvir vunnum ágangi móti føroyingum.

Samstundis, sum tey seinastu tíðindini í undirgrundarmálinum av røttum áttu at verið borin løgtingi og almenningi í løgmansrøðuni 1992, eru løgmaður og landsstýri hansara tigandi og eftir øllum at døma farin út um sínar heimildir í royndum teirra at gera dønum til vildar. Talan er, so sum tað skilst, um eitt stórt afturstig í stríðnum fyri at vinna okkum føroyingum okkara sjálvsøgdu rættindi í undirgrundarmálinum aftur.

Men Føroya Løgting veit av ongum. Løgmaður sigur einki um seinastu verkætlanimar í løgmansrøðum sínum frá 1991 og 1992, og í settum fyrispurningi á tingi frá 12. apríl 1991 um undirgrundarmálið letur hann heldur ikki frætta frá sær.

Almenningurin og harvið eisini tann einstaki løgtingsmaðurin er kunnaður í floksblaði Tjóðveldisfloksins 14. september nr. 47 frá 2. og 3. juli 1992 um, at amerikanarar hava borað bæði í fjør og í ár á føroysku landleiðini í ein landssynning úr Føroyum. Leitað er úti móti markinum móti Hetlandi og eisini heilt inn móti Munkagrunninum. Seismiskar kanningar vórðu gjørdar, eins og borað varð frá skipi langt niður í havbotnin.

21. august 1992, ella 7 vikur seinni, sigur almenna tíðindasendingin, Dagur og Vika, at landsstýrið enn tá hevur viðmælt yvir fyri donsku stjórnini, at fremmand feløg eru farin undir rannsóknir undir Føroyum.

Tað verður soleiðis dult fyri løgtinginum, at landsstýrið er í fullari ferð á aðrari kós enn henni, ið løgtingið setti út í kortið við samtyktini frá 1975.

Løgtingssamtyktin frá 1975 sigur: "Føroya Løgting samtykkir, at málsøkið undirgrund Føroya og havbotnurin verður yvirtikið sum føroyskt sermál.

Løgtingið tekur til eftirtektar, at landsstýrið hevur havt samráðingar við donsku ríkisstjórnina um hesa yvirtøku, og áleggur landsstýrinum at halda fram við hesum samráðingum hagar, til málið er greitt."

Her eru ongar heimildir givnar landsstýrinum til at tulka avgerð løgtingsins øðrvísi enn til at samráðast um eina yvirtøku til sermál. Hvørki fyrireikandi kanningar, leitingar, ella vinnu burtur úr undirgrundini er tað heimilað landsstýrinum til at fara undir.

Eru ikki avsannandi tíðindi í fjølmiðlunum røtt, so er framferð landsstýrisins greitt í stríð við samtyktir løgtingsins.

Grønland fekk sína egnu heimastýrislóg setta í gildi 1. mai 1979 (Lov nr. 577 af 29.11.1978). Í grønlendsku heimastýrislógini, sum víkur frá teirri føroysku júst í undirgrundarmálinum, stendur í § 8:

"Den fastboende befolkning i Grønland har grundlæggende rettigheder til Grønlands naturgivne ressourcer.

**Stk. 2.** Til sikring af den fastboende befolknings rettigheder med hensyn til de ikke-levende ressourcer og til sikring af rigsenhedens interesser fastsættes det ved lov, at forundersøgelse, efterforskning og udnyttelse af nævnte ressourcer finder sted i henhold til aftale mellem regeringen og landsstyret.

**Stk. 3.** Forinden aftale efter stk. 2 indgås, kan et landsstyresmedlem kræve, at sagen forelægges for landstinget, som kan bestemme, at landsstyret ikke skal medvirke til indgåelse af en aftale af det pågældende indhold."

Sum tað skilst, so er tað í grønlendsku heimastýrislógini ásett, at landstingið, eftir áheitan frá landsstýrismanni, kann nokta einstøkum verkætlanum, eisini tá ið tær fevna um rannsóknir av undirgrundini.

Ásetingar hesum viðvíkjandi eru ikki í teirri føroysku heimastýrislógini, men givið er, at Føroya Løgting ikki kann lata nakað um seg fara í hesum máli uttan at góðkenna tað fyrst.

Tær ásetingar, sum annars eru í heimastýrislógini viðvíkjandi undirgrundini, verða brotnar av ríkisstýrinum, og sitandi landsstýrið hevur nú vælsignað hesi áralongu brot við at heimila ríkisstýrinum víðari rannsóknir á einum øki, sum teir í sambandi við altjóða rætt, grundlógina, heimastýrislógina og forarbeiðini til heimastýrislógina og donsku undirgrundarlógina frá 1950 í heimildarloysi hava ognartikið frá føroyingum.

Tjóðveldisflokkurin mælir til, at løgtingið aftur kemur inn í myndina; ikki letur sær lynda einkisigandi løgmansrøður sum einasta kunning í undirgrundarmáli-

num, men krevur at fylgja við og taka avgerðir í fult mát í hesum máli soleiðis. at ábyrgdin fyri politisku framtíð Føroya ikki hongur í leysum lofti.

. / . Hjáløgd eru brot úr seinastu 8 løgmansrøðunum.

Fulla orðaljóðið í løgmansrøðunum 1985-1992 í sambandi við undirgrundarmálið:

**Atli Dam:**
Løgmansrøðan frá 1985: "Undirgrundssamráðingarnar, sum eisini verða uppaftur tiknar í heyst, eru sera týðandi. Semja er í Føroyum um ikki at góðtaka skipan, sum gevur Føroyum minni enn avgerðarrættin viðvíkjandi umsiting av egnari undirgrund.

Løgfrøðinganevndin, sum sett varð í fjør, hevur fyri fáum døgum síðani latið álit úr hondum. Niðurstøða løgfrøðinganna stuðlar til fulnar sjónarmiðið um, at eingin løgfrøðilig forðing finst fyri at gera málsøkið Føroya Undirgrund til føroyskt sermál.

Spurningurin er tí í dag einans politiskur".

**Atli Dam:**
Løgmansrøðan frá 1986: "Samráðingarnar um undirgrundina eru munin tyngri. Stjórnin tykist sera bangin fyri broyting í avgerðarrættinum viðvíkjandi undirgrundini.

Kortini skal loysn finnast, og mugu vit sannføra danir um, at alt annað enn endaligur føroyskur avgerðarrættur í hesum máli er óverdug og ótolandi støða, tá ið hugsað verður um tey kort, vit hava á hondum.

Hitt, at tryggja donsk áhugamál og rættindi í eini praktiskari undirgrundaravtalu í samband við, at málsøkið gerst føroyskt sermál, er nógv einfaldari mál at loysa, so her nýtist dønum ikki at óttast".

**Atli Dam:**
Løgmansrøðan frá 1987: "Sum nevnt í fjør hevur gingið sera illa at koma til sættis við danir um cina undirgrundaravtalu.

Teir hava ikki viljað tala um yvirtøku, men bert um cina sonevnda ráevnisskipan.

Vit mugu nú sjálvi gera uppskot, sum bæði fevna um, at undirgrundarmál verða sermál og um ráevnisumsiting, sum tryggjar ríkinum ávís áhugamál, men væl at merkja trygdir, sum einans koma upp á tal undir teirri fortreyt, at málsøkið gerst føroyskt sermál.

**Atli Dam:**
Løgmansrøðan frá 1988: "Samgongan hevur roynt at brynja seg til enn eitt samráðingarumfar um at gera málsøkið Føroya undirgrund til sermál.

Løgmaður setti ein arbeiðsbólk at útvega okkum eyka prótilfar og lýsa spurningin út fólkarættarligum, ríkisrættarligum sýni og annars við atliti at møguligum avtalum, sum gerast mugu við danir áðrenn yvirtøkuna.

Nevndin hevur greitt eitt sera nágreiniligt og fevnandi álit út hondum, og meti eg, at vit eru væl betri fyri.

Tilfarið er av slíkari náttúru, at tað ikki verður almannakunngjørt, áðrenn samráðingar hava verið.

Í fyrstu syftu verður hetta álit tí at viðgera í sjálvari samráðingarnevndini fyri afturlatnum hurðum, ið hvussu er, til vitað er, um danir eru sinnaðir at koma í veruligar samráðingar.

**Jógvan Sundstein**
Løgmansrøðan frá 1989: "Samráðingar við donsku stjórnina um undirgrundina fara at halda fram".

Við tí tilfari, sum útvegað er, og við samráðingunum í august 1988 sum grundarlagi verður arbeitt víðari við málinum.

Danska stjórnin hevur sent landsstýrinum uppskot um kommisorium hjá tilætlaðu arbeiðsnevndini. Landsstýrið og samgongan fara heilt skjótt at viðgera hetta uppskot, so nevndin kann verða sett og fara til arbeiðis".

**Jógvan Sundstein**
Løgmansrøðan frá 1990: "Nevndin, sum samgongan setti at stíla fyri samráðingum um undirgrundina, hevur sent donsku stjórnini uppskot um eitt sindur broytt kommisorium hjá sokallaðu arbeiðsnevndini, sum skal halda fram í arbeiðinum og finna eina endaliga loysn.

Samgongan er sinnað at fáa greitt hetta mál skjótt. Eisini tí tað kann gerast aktuelt at geva loyvi til royndarboringar eftir ráevni í undirgrundini".

**Atli Dam**
Løgmansrøðan frá 1991: "Samráðingarnar um endaligu sáttmálarnar á undirgrundarøkinum og yvirtøkuna av undirgrundarlóggávuni eru nú veruliga komnar í gongd. Landsstýrið hevur skilt, at nevndin hevur gjørt sær greitt, at nú ræður um ikki at gerast ov seinur á sjóvarfallinum, skulu vit ikki detta burtur ímillum í tí virksemi, sum er farið í gongd beint hinumegin mark okkara móti Bretlandi."

**Atli Dam**
Løgmansrøðan frá 1992: "Seinna hálvár 1991 tóktust samráðingarnar í felags undirgrundarnevndini at gera stór framstig, men tíverri kom stígur um ársskiftið, og eru nú vónirnar um eina felags niðurstøðu ikki so bjartar sum á ólavsøku í fjør. Roknað verður við fundi á politiskum stigi seint í august, sum eina roynd at fáa nevndararbeiðið aftur á beint. Eisini tykist drúgført at fáa endaliga semju við bretar um markið millum Føroyar og Bretland."

# Álit

# í

*løgtingsmáli nr. 6/1992: Viðari framferð í undirgrundarmálinum.*

Málið er lagt fram av Tjóðveldisflokkinum tann 27. august 1992 og eftir 1. viðgerð 27. oktober 1992 beint í marknaðarnevndina.

**Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið.**

Síðani málið kom fram, hava vit fingið at vita, at málsøkið: Ráevni í føroysku undirgrundini er yvirtikið, og at landsstýrið eigur at kunna løgtingið um allar tær avtalur, ið gjørdar eru viðvíkjandi undirgrundini.

Eisini verður sagt, at eingin hevur fingið at vita, hvat kundi henda við undirgrundarmálinum. Svarað verður bert, at arbeitt verður við málinum.

Tað ljóðar eisini, at ymist fer fram á føroyskum sjóøki, bæði við seismiskum kanningum og royndarboringum til havs.

Marknaðarnevndin heldur, at landsstýrið eigur regluliga at kunna løgtingið um, hvat hendir viðvíkjandi undirgrundini, og setir tí ein samd nevnd ístaðin fyri uppskot Tjóðveldisfloksins fram soljóðandi:

## Uppskot

## til

## samtyktar

Landsstýrið skal kunna løgtingið regluliga um tær samráðingar, sum fara fram um at gagnnýta føroyska búskaparliga økið, og um tær samráðingar, sum eru við grannarnar um ivamál viðvíkjandi markinum.

Ein minniluti (Edmund Joensen, Hergeir Nielsen og Helena Dam á Neystabø) førir fram, at eins og í øðrum viðurskiftum viðvíkjandi útlendskum áhugamálum, so sum handils- og fiskiveiðisáttmálar, so heldur minnilutin, at tað er av so stórum prinsippiellum týdningi, at løgtingið eigur at hava fullan kunnleika og avgerðarheimild í komandi orkupolitikkinum í føroyskum land- og sjóøki, hvat ráevnum úr undirgrundini viðvíkur.

Minnilutin setir tí fram soljóðandi:

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Áðrenn týðandi loyvi, so sum seismiskar kanningar, royndarboringar v.m., verða givin, skulu hesi góðkennast av Føroya løgtingi.

# 7. Broytingar í meirvirðis-gjaldsskipanini

**Uppskot**

**til**

*Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. ..... frá ..... 1992 um meirvirðisgjald verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 2, stk. 3 a verður framman fyri "viðgerð á sjúkrahúsi" sett:
   "heilivágur, tilfar til sjúkrarøkt"
2. Í § 2, stk. 3 verður undir nýggjum litra "o" sett: "trygdarútgerð til skip/bátar."

**§ 2.**

Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1993.

*Lagtingslov om ændring i lagtingslov om meromsætningsafgift.*

**§ 1.**

I lagtingslov nr. ..... af ..... 1992 om meromsætningsafgift foretages følgende ændringer:

1. I § 2, stk. 3 a indsættes foran "Hospitalsbehandling": "medisin, sygeplejeartikler".
2. I § 2, stk. 3 indsættes under nyt litra "o": "sikkerhedsudstyr til skib /både".

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft 1. januar 1993.

**Viðmerkingar:**

Fyri fáum døgum síðani samtykt 17 tingmenn, at meirvirðisgjaldsskipan skuldi setast í verk her á landi. Uppskotið um MVG kom úr landsstýrinum, og vóru fortreytirnar hjá teim 17 tingmonnunum fyri at samtykkja uppskotið tær, at tað var "teirrasa" landsstýrið, ið stóð aftan fyri uppskotið og so sjálvandi tær upplýs-

ingar, sum landsstýrið gav í samband við hetta mál. Ein av lógargreinunum til hetta mál segði frá, hvørjar vørur og tænastur vórðu undantiknar avgjaldsskyldu-ni. Nevnliga tær í § 2, stk. 3 nevndu.

§ 2, stk. 3 a snýr seg um heilsuverkið, har víst verður til at "viðgerð á sjúkrahúsi, læknavirksemi, tannlækna- og annað dentalvirksemi, kiropraktikk, fysioterapi og onnur verulig heilsurøkt" er undantikið avgjaldsskyldu.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið frá landsstýrinum verður í viðmerkingunum til lógaruppskotið frá landsstýrinum beinleiðis sagt, at tá avgerð skal takast um ein tænasta (viðgerð) kann metast at vera "onnur verulig heilsurøkt" verður hugsað um fylgjandi:

1) Verður viðgerðin gjørd av einum autoriseraðum læknapersóni, er hon stutt og greitt meirvirðisgjaldsfrí.
2) Sama er galdandi, um viðgerðin gevur rætt til refusión sambært sjúkrakassanum.
3) Um hvørki treytirnar í 1) ella 2) eru loknar, verður kannað um "Sundhedsstyrelsen" metir, at viðgerðin (møguliga í sambandi við ein ávísan bólk av sjúklingum) hoyrir undir heilsufrøðiliga økið, tað kann t.d. vera, av tí at viðgerðin fer fram sambært ávísan frá lækna ella sjúkrahúsi."

Loksins verður í viðmerkingunum til § 3, stk. 3 a sagt frá eini mongd av viðgerðum, ið eru avgjaldsskyldugar, og er her talan um viðgerðir, sum ikki hava ískoytisrættindi sambært sjúkrakassaskipanina.

Vísandi til omanfyristandandi átti tað at verið ein sjálvfylgja, at heilivágur varð undantikin MVG. Tí í lógini verður jú beinleiðis sagt: 1) at "onnur verulig heilsurøkt" er avgjaldsfrí, og eigur ber at havast í huga, at inntøkan av heilivági hjá mongum er týðandi partur av heilsurøktini. Ja, mong eru tey, ið als ikki kunnu vera heilivágin fyri uttan.

Her skal eisini verða mint á, at stórur partur av "medisinskari viðgerð" - bæði innan og uttan sjúkrahúsgátt - er inntakan av heilivági. Tí er tað heilt burtur við, at landsstýrið tulkar /ætlar hetta soleiðis at heilivágur ikki skal verða undantikin meirvirðisgjaldi! Eisini tá hugsað verður um, at inntakan av heilivági jú er viðgerð, ið gevur rætt til refusión frá sjúkrakassa.

Sostatt átti heilivágur at sloppið undan meirvirðisgjaldi, og fyri ikki at loyva landsstýrinum at gera hetta til ein tulkingarspurning, verður skotið upp, at "heilivágur" kemur í sjálvari lógini at standa sum undantikin meirvirðisgjaldi.

Verður heilivágur ikki undantikin, kemur hesin at dýrka munandi eftir 1. januar 1993, tá 20% verður lagt oman á søluprísin í staðin fyri tey 6%, sum í dag eru í innflutningsgjaldi.

Hetta kemur av sonnum at raka meint og kemur at kennast sum steinur oman á byrðu hjá mongum húski og einstaklingum kring landið.

Ein onnur hugsandi avleiðing av, at heilivágurin gerst so nógv dýrari er, at sjúkrakassagjaldið eisini hækkar munandi eftir 1. januar 1993.

Eisini koma sjúkrahúsini, røktarheimini og aðrir viðgerðarstovnar í landinum at merkja prishækkingarnar av heilivági. Hetta má metast sera óheppið í dag, tá raksturin er skorin at beini, at fáa eina so stóra útreiðslu afturat henni, ið dýrkanin av heilivági kemur at geva eftir 1. januar 1993.

Í síðsta enda kemur hetta at raka sjúklingar og búfólkið. Tí, skal fíggjarætlanin hjá avvarðandi sjúkrahúsum og stovnum halda - og tað skal hon sambært landsstýrinum, so ber als ikki til at leggja slíka eyka útreiðslu á hesar stovnar, uttan tað fær tær avleiðingar, at tað kemur sjúkrarøktini og harvið sjúklingunum aftur um brekku!

Ein onnur ikki óhugsandi avleiðing av, at heilivágurin kemur at dýrka munandi er, at fleiri, sum hava trupult við at fáa endarnar at røkka saman, himpra seg at fara til lækna og at ogna sær tann fyriskrivaða heilivág. Tá eru vit sum tjóð komin langt út - og tá kunnu menn tosa um vælferðarsamfelag so galið, teir vilja!

Umframt tað av landsstýrinum skotið upp, samtykti løgtingið, at útleigan av kantari til útlendsk ferðafólk og bøkur skuldu koma undir lógina at verða undantikið meirvirðisgjald.

Tá støða skal takast til, hvat eigur at verða undantikið og ikki, vilja altíð ymiskar áskoðanir gera seg galdandi.

Tey seinnu árini hevur ikki verið tosað so lítið um trygdarviðurskiftini umborð á bátum - og tað av góðum grundum. Tí má metast skilagott og rætt, at trygdarútgerð til skip/ bátar ikki koma undir meirvirðisgjaldsskipanina.

Hvat samtykta lógaruppskotinum um meirvirðisgjald annars viðvíkur, eru nýggjar upplýsingar komnar fram, hvørja ávirkan hetta kemur at hava á vanligar húsarhaldsvørur.

Hesar upplýsingar samsvara ikki teim, ið landsstýrið áður er komið við, og er tað tí umráðandi, at landsins borgarar fáa trygd fyri, um vanligu húsarhaldsvørurnar gerast bíligari (soleiðis sum landsstýrið hevur sagt frá), ella tær gerast dýrari (soleiðis sum handilsvinnan alment hevur sagt frá).

Tá tær 17 atkvøðurnar óivað hava verið tengdar júst at ávirkanini av MVG á vanliga húsarhaldið, eigur nú tingið og føroyska fólkið nágreiniliga at fáa at vita, um fortreytirnar fyri meirilutaavgerðini í veruleikanum hava verið skeivar.

Ið hvussu so er, eigur landsstýrið at tryggja, at tær upplýsingar, ið givnar eru í hesum máli, at húsarhaldsvørurnar gerast munin bíligari, koma at halda.

Tí verður skotið upp soljóðandi:

## Uppskot

## til

## samtyktar

I "Álagt verður landsstýrinum at taka neyðug stig til at tryggja, at vanligu húsarhaldsvørurnar gerast bíligari eftir, at lógin um meirvirðisgjald verður sett í verk".

II "Heitt verður á landsstýrið nágreiniliga at kunna føroyska fólkið um ávirkanina av MVG á vanliga húsarhaldið".

## Álit

### I

*løgtingsmáli nr. 7/1992: Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald.*

Málið er lagt fram av Tordi J. Niclasen, løgtingsmanni, tann 31. august 1992 og eftir 1. viðgerð 21. oktober 1992 beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur havt fundir við umboð fyri Toll- og Skattstovu Føroya, Meginfelag Sjúkrakassa Føroya og við landsstýrismannin í heilsumálum.

Eisini hevur fundur verið við landsapotekaran, ið upplýsti, at av søluni verða 86% goldin av almennum kassum, t.e. sjúkrahúsini, Almannastovan o.s.fr.

Landsapotekarin metti, at samlaða meirvirðisgjaldið, ið álagt verður apoteksverkinum, verður umleið 12 mió. kr. Mett verður frá apoteksverkinum, at avlopið fyri hetta árið verður umleið 7 mió kr., og verður gjørt vart við, at bruttovinningurin er fallin úr 39% niður í 35,5%.

Umboðið fyri Tollstovuna metti, at trupult verður at umsita uppskotnu broytingarnar.

Umboðið fyri sjúkrakassan upplýsti, at fíggjarligu umstøður sjúkrakassans eru vánaligar.

Landsstýrismaðurin í heilsumálum segði frá, at landsstýrið ætlar at broyta kunngerð um endurgjaldsskipanina fyri heilivág og at broyta galdandi kunngerð um avlopið hjá apoteksverkinum við tí fyri eyga at lækka prísin á heilivági. Upplýsti eisini, at landsstýrið ætlar at styrkja sjúkrakassarnar við at hækka C-limagjaldið til 600 kr. Um ætlaðu broytingarnar av endurgjaldsskipanini varð sagt, at lívsneyðugur heilivágur verður stuðlaður við 75%, minni neyðugur heilivágur við 50% og annar heilivágur einki endurgjald.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Vísandi til omanfyri nevndu upplýsingar frá Toll- og skattstovu Føroya og frá landsstýrismanninum kann meirilutin (Vilhelm Johannesen, Jørgen Niclasen og Eyðun Viderø) ikki taka undir við fyriliggjandi lógaruppskoti um broyting í lógini um meirvirðisgjald.

Viðvíkjandi § 1, pkt. 2 í uppskotinum um "Trygdarútgerð til skip/bátar" kann sami meiriluti ikki taka undir við hesum út frá tí, at skip, sum eru vinnurekandi, fáa meirvirðisgjaldið av trygdarútgerð endurgoldið, og at hetta sostatt bert snýr seg um stuttleikabátar.

Minnilutin (Finnbogi Arge) tekur undir við pkt. 1.

Minnilutin (Lasse Klein) tekur undir við uppskotinum og mælir løgtinginum til at samtykkja tað.

# 8. Fíggjarløgtingslóg 1993

**Uppskot til fíggjarløgtingslóg 1993**

| | **Inntøkur**<br>**Indtægter** | **Roknsk.**<br>**1991** | **Játtan**<br>**1992** | **1992**<br>**Endursk.** | **Játtan**<br>**1993** |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Inntøkuskattir<br>Indkomstskatter | 987687 | 1090000 | 1010000 | 902000 |
| 2 | Toll-, nýtslu- og framleiðslugjøld<br>Told-, forbrugs- og prod.afg. | 762269 | 831000 | 799000 | 949000 |
| 3 | Onnur gjøld<br>Andre afgifter | 3689 | 2450 | 2450 | 3100 |
| 4 | Inntøkur av spæli<br>Indtægter ved spil | 666 | 600 | 600 | 700 |
| 5 | Rentuinntøkur<br>Renteindtægter | 96027 | 60000 | 60000 | 65000 |
| 6 | Landsfyritøkur<br>Landsvirksomheder | | | | 8000 |
| 7 | Partur av avl. tjóðb.<br>And.af nat.bankens oversk. | 34126 | 20000 | 20000 | 25000 |
| 8 | Gj. frá danska ríkisk.<br>Overf. fra den d. stat | 770877 | 789000 | 801500 | 805000 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 9 | Ymsar inntøkur<br>Diverse indtægter | 3111 | 2205 | 2205 | 1205 |
| | **Inntøkur tils.<br>Ialt** | **2658452** | **2795255** | **2695755** | **2759005** |
| | **Rakstrarútr.<br>Driftsudgifter** | **Roknsk.<br>1991** | **Játtan<br>1992** | **1992<br>Endursk.** | **Játtan<br>1993** |
| 10 | Løgtingið<br>Lagtinget | 16549 | 16470 | 16044 | 16193 |
| 11 | Meginfyrisiting<br>Centraladministrat. | 156659 | 151085 | 146458 | 146029 |
| | Uttanríkismál<br>Udenrigsanligg. | 1849 | 4809 | 2800 | 2810 |
| 12 | Heilsumál<br>Sundhedsvæsen | 346467 | 342776 | 344419 | 353695 |
| 13 | Samferðsla<br>Kommunikation | 169663 | 145250 | 121202 | 128850 |
| | Útbúgving og gransk.<br>Uddann. og forsk. | 375267 | 366655 | 360613 | 369912 |
| 15 | Mentan<br>Kultur | 47277 | 46230 | 44775 | 46238 |
| 16 | Fiskiv., sigling o.t.<br>Fiskeri, søfart m.v. | 527621 | 324777 | 301724 | 261007 |
| 17 | Landbúnaður<br>Landbrug | 35923 | 35971 | 33911 | 34151 |
| 18 | Vinnulív og arbeiðs-marknaður annars<br>Erhverv og arbejds-marked iøvr. | 48058 | 80887 | 110204 | 62966 |
| 19 | Almannamál v. m.<br>Socialvæsen m.v. | 776287 | 758349 | 779755 | 775461 |
| | Íbúðarmál<br>Boligpolitiske anl. | 2003 | 12700 | 7700 | 8000 |
| 20 | Pensiónsútreiðslur<br>Pensionsudgifter | 11225 | 12140 | 12140 | 11190 |
| 21 | Effektivar veðhalds-bindingar<br>Effektive garanti-forpligtelser | 167202 | 80000 | 190000 | 150000 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 22 | Rentuútreiðslur<br>Renteudgifter | 202150 | 223000 | 223000 | 258000 |
| 26 | Ymsar ognarútr.<br>Div. ejendomsudg. | 145 | 700 | 700 | 700 |
| 27 | Óvissar útreiðslur<br>Uvisse udgifter | 20000 | 14000 | 0 | 20000 |
| | **Rakstrarútr. tils.<br>Driftsudg. ialt** | **2904345** | **2615799** | **2695445** | **2645202** |

| | **Íløguútr./ Íløgustudn.<br>Inv. udg./Inv. tilsk.** | **Roknsk.<br>1991** | **Játtan<br>1992** | **1992<br>Endursk.** | **Játtan<br>1993** |
|---|---|---|---|---|---|
| 11 | Meginfyrisiting<br>Centraladministr. | 6326 | 1500 | 1000 | 1000 |
| 12 | Heilsumál<br>Sundhedsvæsen | 14835 | 32400 | 29300 | 35100 |
| 13 | Samskifti<br>Kommunikation | 216169 | 182800 | 172800 | 139000 |
| 14 | Útbúgving<br>Udd. og forskn. | 10369 | 27700 | 19700 | 29775 |
| 15 | Mentan<br>Kultur | 12547 | 16200 | 11550 | 14323 |
| 16 | Fiskiv., sigling o.t.<br>Fiskeri, søfart m.v. | 8464 | 9000 | 9000 | 16000 |
| 18 | Vinnulív og arbeiðs-marknaður annars<br>Erhverv og arbejds-marked ivr. | 1053 | 3200 | 1700 | 6000 |
| 19 | Almannamál<br>Socialvæsen m.v. | 22333 | 17800 | 10907 | 21516 |
| **Íløguútreiðslur/Íløgustudn. tils.<br>Inv./Inv.tilsk. ialt** | | **292096** | **290600** | **255957** | **262714** |

| **Samandráttur<br>Sammendrag** | **Roknsk.<br>1991** | **Játtan<br>1992** | **1992<br>Endursk.** | **Játtan<br>1993** |
|---|---|---|---|---|
| Inntøkur tilsamans<br>Indtægter ialt | 2658452 | 2795255 | 2695755 | 2759005 |
| Rakstrarútr. tils.<br>Driftsudgifter ialt | 2904345 | 2615799 | 2695445 | 2645202 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Rakstrarúrslit | | | |
| Driftsresultat | -245893 | 179456 | 310 | 113803 |
| fløgur/íløgustudn. | | | | |
| Invest./inv.tilskud | 292096 | 290600 | 255957 | 262714 |
| Úrslit aftan á íløgutr. | | | | |
| Resultat efter invest. | -537989 | -111144 | -255647 | -148911 |

**Uppskot til fíggjarløgtingslóg 1993**

| **Rakstr.-stað** | **Konto-nr.** | **Rakstr.- og kontoh.** | **Roknsk. 1991** | **Játtan 1992** | **Endursk. 1992** | **Játtan 1993** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Grein 1** | | **Inntøkuskattir Indkomstskatter** | | | | |
| 1201 | | Vanligur landssk. | | | | |
| | | Iandsskat. t. landsk. | 942620 | 1059000 | 941000 | 850000 |
| | | Endurgj. t. komm. (pens.skatt) | | | | |
| | | Ref. f. pensionistsk. | -29369 | -30000 | -30000 | -30000 |
| | | Felagsskattur | | | | |
| | | Selskabsskat | 43295 | 26000 | 29000 | 11000 |
| 1702 | | Rentuskattur | | | | |
| | | Renteskat | 31141 | 35000 | 55000 | 65000 |
| | | DIS-endurgjald | | | | |
| | | DIS-refusion | | | 5000 | 0 |
| | | Tryggingarsamb. Forsikringselskabet | | | 7000 | 3000 |
| | | Umsit.gj. NIS-DIS | | | | |
| | | Adm. NIS-DIS | | | 3000 | 3000 |
| **Tilsamans** | | | **987687** | **1090000** | **1010000** | **902000** |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Grein 2** | **Toll, nýtslu- og framl.gj.** | | | **Endursk.** | |
| | **Told- og forbrugsafg.** | **R 1991** | **J 1992** | **1992** | **J 1993** |
| | Meirvirðisgjald | | | | |
| | Merværdiafgift | | | | 535000 |
| | Punktgjøld | | | | |
| | Punktafgifter | | | | 205000 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 2017 | | Tollgjøld | | | | |
| | | Toldafgifter | 576995 | 645000 | 604500 | 10000 |
| 2041 | | Brennioljugjald | | | | |
| | | Brændselsolieafg. | 78113 | 82000 | 89000 | 85000 |
| 2708 | | Framleislugjøld | | | | |
| | | Fremstillingsafg. | 32440 | 30000 | 30000 | 32000 |
| 2713 | | Skrásetingargjald | | | | |
| | | Registreringsafg. | | | | |
| | 23615 | Virðis- og vektargj. | | | | |
| | | Værdi- og vægtafg. | 34148 | 30000 | 30000 | 35000 |
| | 33014 | Umskrásetingargj. | | | | |
| | | Afgift for omregistr. | | 3000 | 3000 | 3000 |
| 2801 | | Vegskattur | | | | |
| | | Vejafgifter | 29780 | 30000 | 31500 | 33000 |
| 2853 | | Ferðaavgjald | | | | |
| | | Rejseafgift | 10793 | 11000 | 11000 | 11000 |
| **Tilsamans** | | | **762269** | **831000** | **799000** | **949000** |

| **Grein 3** | **Onnur gjøld** | | | **Endursk.** | |
|---|---|---|---|---|---|
| | **Andre afg.** | **R 1991** | **J 1992** | **1992** | **J 1993** |
| 3052 | Gjøld f. spiritus-skamtanarkort | | | | |
| | Afg. f. spiritusra-tioneringsk. | 135 | 220 | 220 | 0 |
| 3102 | Loyvisgjøld | | | | |
| | Afgifter for bev. | 79 | 100 | 100 | 100 |
| 3204 | Arvagjøld | | | | |
| | Arveafgifter | 2762 | 2000 | 2000 | 2500 |
| 3256 | Lestagjald | | | | |
| | Skibsafgift | 167 | 100 | 100 | 100 |
| 3501 | Bøtur | | | | |
| | Bøder | 546 | 30 | 30 | 400 |
| **Tilsamans** | | **3689** | **2450** | **2450** | **3100** |

| **Grein 4** | **Inntøkur av spæli**<br>**Indtægter ved spil** | **R 1991** | **J 199** | **Endursk. 1992** | **J 1993** |
|---|---|---|---|---|---|
| 4011 | Avlop av happadr.<br>Oversk. ved lotteri | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 4058 | Burturlutingargjald<br>Afgifter af lotteri | 224 | 100 | 100 | 200 |
| 4096 | Gjøld av øðr. vinn.<br>Afg. af andre gev. | 442 | 500 | 500 | 500 |
| **Tilsamans** | | **666** | **600** | **600** | **700** |

| **Grein 5** | **Rentuinntøkur**<br>**Renter m.v.** | **R 1991** | **J 1992** | **Endursk. 1992J** | **1993** |
|---|---|---|---|---|---|
| 5105 | Rentuinntøkur<br>Renteindtægter | 96027 | 60000 | 60000 | 65000 |

| **Grein 6.** | **Landsfyritøkur** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Einkarsølan<br>Landets Spiritus-<br>monopol | | | | 7000 |
| | Landsbanki Før.<br>Landsbanken | | | | 1000 |
| | | | | | 8000 |

**Viðm:** Einkarsøluni verður heimilað at læna upp til 4 mió. kr. til fígging av rakstrinum.

| **Grein 7** | **Partur av avlopi Tjóðb.**<br>**Andel af Nationalbks.**<br>**oversk.** | **R 1991** | **J 1992** | **ES 1992** | **J 1993** |
|---|---|---|---|---|---|
| 7011 | Partur av avl. Tjóðb.<br>Andel i Nat.bankens<br>oversk. | 34126 | 20000 | 20000 | 25000 |

| **Grein 8** | **Gj. frá danska rikisk.**<br>**Overf. fra staten** | **R 1991** | **J 1992** | **Endursk.**<br>**1992** | **J 1993** |
|---|---|---|---|---|---|
| 8001 | Heildarveiting<br>Bloktilskud | 538800 | 551000 | 551000 | 563000 |
| 8005 | Afturgjald<br>Refusioner | 232077 | 238000 | 250500 | 242000 |
| **Tilsamans** | | **770877** | **789000** | **801500** | **805000** |

| **Grein 9** | **Ymsar inntøkur**<br>**Div. indtægter** | **R 1991** | **J 1992** | **Endursk.**<br>**1992** | **J 1993** |
|---|---|---|---|---|---|
| 9014 | Ymsar inntøkur<br>Diverse indtægter | 1945 | 5 | 5 | 5 |
| 9218 | Oljugoymslur<br>Olieanlæg | 1166 | 1200 | 1200 | 1200 |
| 9256 | Frá berghols- og brúgvagerð<br>Fra tunnel- og brob. | | 1000 | 1000 | 0 |
| **Tilsamans** | | **3111** | **2205** | **2205** | **1205** |

| | | **R 1991** | **J 1992** | **Endursk.**<br>**1992** | **J 1993** |
|---|---|---|---|---|---|
| **Inntøkur tilsamans**<br>**Indtægter ialt** | | **2658452** | **2795255** | **2695755** | **2759005** |

| **Grein 10** | **Løgtingið**<br>**Lagtinget** | **R 1991** | **J 1992** | **Endursk.**<br>**1992** | **J 1993** |
|---|---|---|---|---|---|
| 10018 | Løgtingsmenn<br>Lagtingsmedl. | 9792 | 9476 | 9406 | 9411 |
| 10106 | Løgtingsbygningur<br>Lagtingsbygning | 830 | 665 | 605 | 605 |
| 10158 | Løgtingsskrivstovan | | | | |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Lagtingssekret. | 2650 | 2386 | 2313 | 2314 |
| 11986 | Tingmannaráð Útnorðurs Vestnord. parlam. samarb.råd | 241 | 213 | 200 | 200 |
| 10208 | Løgtingstíðindi Lagtingstidende | 460 | 407 | 360 | 360 |
| 10301 | Grannskoð. (ekst.) Revision (extern) | 115 | 140 | 140 | 140 |
| 10403 | Grannskoðan(int.) Revision (intern) | 2015 | 2900 | 2757 | 2900 |
| 10505 | Landsskattanevnd Landsskatteudvalg | 129 | 103 | 103 | 103 |
| 11991 | Norðurlandaráð Nordisk Råd | 317 | 180 | 160 | 160 |
| **Rakstur** | | **16549** | **16470** | **16044** | **16193** |

| **Grein 11** | **Landsfyrisiting** | | | **Endursk.** | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Landsadministr. | **R 1991** | **J 1992** | **1992** | **J 1993** |
| 11015 | Løgm. og landsst. Lagmand og landsst. | 3707 | 3750 | 3720 | 3500 |
| 11048 | Kunng.savn og -blað Bekendtg.saml.og -blad | 115 | 353 | 313 | 350 |
| 11053 | Landsskrivstovan Landskontoret | 14374 | 14800 | 14577 | 14700 |
| 11072 | Fyrir. av umhvørvis-fyrisiting Forber. af miljøadm. | 278 | 400 | 400 | 300 |
| 11086 | Sjóvinnufyrisiting Søfartsadminist. | 660 | 900 | 900 | 900 |
| 11758 | Norðurl.samv., ráðharraráð v.m. Nord. samarb., ministerråd mv. | | 800 | 700 | 500 |
| 11193 | Útbygg. av Elektron Udb. af Elektron | 3348 | 0 | 0 | 0 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 11257 | Líkningarráðið<br>Ligningsrådet | 32559 | 33011 | 32691 | 32891 |
| 11276 | Skrásetingareftirlit<br>Registertilsyn | 70 | 300 | 300 | 300 |
| 11307 | Landsfólkayvirlit<br>Folkeregister | 837 | 991 | 986 | 990 |
| 11359 | Almannastova<br>Socialforvaltning | 15005 | 15395 | 15195 | 15290 |
| 11409 | Landsskúlafyrisiting<br>Landsskoleadm. | 10319 | 10700 | 10223 | 10228 |
| 11414 | Stuðulsstovan<br>Adm.af udd.støtte | 905 | 1007 | 1007 | 1000 |
| 11433 | Fyrir. av nýggjari avgj.skipan<br>Forber. af nyt afgifts-system | 7816 | 4700 | 4700 | 1000 |
| 11447 | Føroya Tollstova<br>Fær. Toldkont. | 14339 | 14305 | 14204 | 14000 |
| 11452 | Føroya Gjaldstova<br>Regnsk.dir. og fin.forvaltning | 13020 | 11536 | 11360 | 11500 |
| | Menning av fíggjarst.skipan | | | | |
| | Udvikl. af økonomi-st.system | | | | 2000 |
| 11554 | Tolleftirlit<br>Toldkontrol | 5200 | 5150 | 5095 | 5500 |
| 11604 | Valuta- og prísráð<br>Valuta- og prisåd | 1467 | 1354 | 1342 | 1300 |
| 11618 | Arbeiðsmarkn.ráð<br>Arbejdsmarkedsråd | 0 | 20 | 20 | 0 |
| 11656 | Lønarráð<br>Lønningsråd | 0 | 20 | 20 | 20 |
| 11661 | Heilsu-og heima-sjúkras.fyris.<br>Adm. sundh.- og hjemmesygepl. | 1200 | 1020 | 1012 | 1020 |
| 11703 | Búskaparráð<br>Økonomisk råd | 114 | 90 | 87 | 90 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 11709 | | Hagstovan | | | | |
| | | Færøernes Statistik | 5339 | 4449 | 4323 | 3950 |
| 11758 | | Ferða-og dagp. innan-og uttanl. | | | | |
| | | Rejse-, dagp. inden- og udenl. | 4377 | 4100 | 3800 | 4000 |
| 11808 | | Innheintingarútr. | | | | |
| | | Udgifter ved ink. | 458 | 372 | 372 | 500 |
| 11851 | | Ognin Tinganes | | | | |
| | | Ejend. Tinganes | 1690 | 2470 | 2070 | 2300 |
| 11879 | | Lógarsavn | | | | |
| | | Lovsamling | 448 | 500 | 500 | 500 |
| 11898 | | Útskift. og matr.st. | | | | |
| | | Udsk. og matrikelk. | 6478 | 6437 | 5560 | 5600 |
| 11901 | | Landsverkfr.skr.st. | | | | |
| | | Landsing. kontor | 9427 | 9420 | 8446 | 8950 |
| | | Aðrar útreiðslur Andre udgifter | | | | |
| | 203507 | Umboðan | | | | |
| | | Representation | 1234 | 1100 | 1000 | 1300 |
| | 253704 | Útreiðslur av vali | | | | |
| | | Udgifter vedr. valg | 27 | 100 | 100 | 100 |
| | 253753 | Dóms- og løgr.mál | | | | |
| | | Retsvæsen og politi | 49 | 35 | 35 | 50 |
| | 373305 | Landsst. at ráða yvir | | | | |
| | | Landsst. at råde over | 1799 | 1500 | 1400 | 1400 |
| **Rakstur** | | | **156659** | **151085** | **146458** | **146029** |
| 11953 | | Umbygg., Tinganes | | | | |
| | | Ombyg., Tinganes | 1264 | 1500 | 1000 | 1000 |
| | | Tollstova, Klaksvík, keyp/umb. | | | | |
| | | Toldkont., Klaksv. | 5062 | | | |
| **Íløgur** | | | **6326** | **1500** | **1000** | **1000** |
| | | | **162985** | **152585** | **147458** | **147029** |

| | **Uttanríkismál**<br>**Udenrigsvæsen** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 11948 | Menningarhjálp<br>Udviklingsbist. | 60 | 3000 | 1000 | 1000 |
| 11967 | Før.visk.st. Keypm.<br>Fær. repr.kont. Kbh. | 1074 | 1070 | 1064 | 1070 |
| 11972 | Uttanríkistæn. Aberd.<br>Udenrigstj. i Aberd. | 715 | 739 | 736 | 740 |
| | | **1849** | **4809** | **2800** | **2810** |

| **Grein 12** | **Heilsumál**<br>**Sundhedsvæsen** | **R 1991** | **J 1992** | **Endursk.**<br>**1992** | **J 1993** |
|---|---|---|---|---|---|
| 12007 | Sjúkrakassar<br>Sygekasser | 16111 | 14000 | 18000 | 15000 |
| 12012 | Hjálpitólamiðstøð<br>Centr.for hjælpeudst. | 2442 | 2442 | 2426 | 2400 |
| 12026 | Útr. viðv. Ríkis-sjúkrahúsinum<br>Udg. vedr. Rigshosp. | 25558 | 26500 | 26500 | 27500 |
| 12109 | Landssjúkrahúsið<br>Landssygehuset | 211507 | 211500 | 209925 | 215000 |
| 12202 | Klaksvíkar Sjúkrah.<br>Klaksvík sygehus | 40950 | 39700 | 39420 | 40400 |
| 12304 | Suðuroyar Sjúkrahús<br>Suðuroyar sygehus | 23757 | 24500 | 24348 | 24900 |
| 12508 | Læknar<br>Læger | 2247 | 2500 | 2500 | 2500 |
| 12653 | Heilsu-og heimasj. systraskipan<br>Sundheds-,hjemme-sygeplejeordn. | 15063 | 12500 | 12368 | 12600 |
| 12672 | Skúlalæknaskipan<br>Skolelægeordning | 169 | 264 | 264 | 264 |
| 12769 | Arbeiðsmedisinsk klinikk<br>Arbejdsmediciusk klinik | 795 | 793 | 786 | 786 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 12774 | | Upplýs. um eykv.<br>Oplysn. om AIDS | 37 | 340 | 190 | 300 |
| 12907 | | Ymiskar útreiðslur<br>Diverse udgifter | | | | |
| | 303011 | Farsóttir<br>Epidemiske sygd. | 3 | 70 | 70 | 10 |
| | 303044 | Hvíldarh. Naina<br>Hvilehj. Naina | 1537 | 1537 | 1525 | 1525 |
| | 303077 | Vaksinatiónir<br>Vaccinationer | 705 | 450 | 450 | 450 |
| | 303107 | Uppl. um getnaðar-fyribyrging<br>Opl. om svanger-skabsforebygg. | 398 | 265 | 265 | 390 |
| | 303115 | Tubbaksráð<br>Tobaksskaderådet | 82 | 100 | 100 | 100 |
| | | Rúsevnisráð<br>Narkotikabek.råd. | 48 | 100 | 100 | 100 |
| | 303148 | Heilsuk. av barnak.<br>Sundhedskontr. for gravide | 480 | 400 | 400 | 475 |
| | 303156 | Læknakann. av børn.<br>Lægeunders. af børn | 477 | 450 | 450 | 475 |
| | 303164 | Kanning og viðg. av kynssjúkum<br>Behandl. af vene-riske sygd. | 18 | 65 | 65 | 20 |
| | 303243 | Vigerð av rúsdr.-misnýtarum<br>Heilbrigdið | 4000 | 4200 | 4167 | 4200 |
| | | Behandl.hj. Heilbr. | | | | 4200 |
| | 373305 | Landsst. at ráða yvir<br>Landsst. at råde over | 83 | 100 | 100 | 100 |
| **Rakstur** | | | **346467** | **342776** | **344419** | **353695** |
| | | Klaksvíkar Sjúkra-hús,umv./umb.<br>Klaksvík sygehus, omb./nyb. | 1255 | 1000 | 100 | 1000 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Klaksvíkar Sjúkrahús, nýb. | | | | |
| | Klaksv. sygeh., nyb. | | 0 | 0 | |
| | Suðuroyar Sjúkrah., nýb. | | | | |
| | Suðuroyar sygeh., nyb. | 9001 | 20000 | 19000 | 21000 |
| | Suðuroyar Sjúkrahús, umb. | | | | |
| | Suðuroyar sygehus, omb. | | 0 | 0 | |
| | Landssj., umvæling | | | | |
| | Landssygeh., rep. | | 6000 | 6000 | 11000 |
| | Landssj., umbygg. | | | | |
| | Landssygeh., omb. | | 2000 | 2000 | |
| | Landssjúkrah., nýb. | | | | |
| | Landssygeh., nyb. | 2886 | 0 | 0 | 0 |
| | Sjúkrasystraskúlin | | | | |
| | Sygeplejeskolen | | 1000 | 1000 | 0 |
| | Hotel Tórsh., Kbh. | | | | |
| | Hotel Torsh., Kbh. | 93 | 500 | 500 | 900 |
| | Heilsumiðstøðir | | | | |
| | Sundhedscentre | 1200 | 1800 | 600 | 1200 |
| | Landslæknahúsini | | | | |
| | Landslægehuset | 400 | 100 | 100 | 0 |
| **Íløgur** | | **14835** | **32400** | **29300** | **35100** |
| | | **361302** | **375176** | **373719** | **388795** |

| **Grein 13** | **Samf. og samskifti** | | | **Endursk.** | |
|---|---|---|---|---|---|
| | **Kommunikation** | **R 1991** | **J 1992** | **1992** | **J 1993** |
| 13251 | Tyrlutænastan | | | | |
| | Helikoptertjen. | 7000 | 5000 | 3930 | 5000 |
| 13265 | Strandfarask. Lands. | | | | |
| | Lagtingets kystfart | 48334 | 37000 | 36599 | 37000 |
| 13279 | Bygdaleiðir | | | | |
| | Busruter | 24495 | 20000 | 17354 | 16500 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 13089 | Postverkið<br>Postvæsen. bygge-<br>og driftsf. | 15000 | 13000 | 8816 | 5000 |
| 13125 | Útvarpssendistøð,<br>rakstur<br>Radiosender, drift | 2501 | 1500 | 1500 | 1500 |
| 13106 | Landsst. at ráða yvir<br>Landsst. at råde over | 193 | 250 | 250 | 250 |
| 13094 | Raksl. av veganeti:<br>34 Vanligt hald,<br>36 Vetrarhald, 38<br>Ferjulegur, 39 Asf.:<br>Dr. og vedl. af vejn. | 28984 | 23500 | 18500 | 26600 |
| 13056 | Fyrit. og útg. hjá LV:<br>56 Mobil, amboð,<br>nýkeyp og rakstur,<br>57 Smiðj., 58 Skervv.,<br>59 Asfaltverk:<br>Landsing. virks. og<br>redskaber | 43156 | 45000 | 34253 | 37000 |
| **Rakstur** | | **169663** | **145250** | **121202** | **128850** |
| 13018 | Nýgg. vegir og brýr,<br>breiðkan av brúm<br>støm ábøtur v.m.:<br>30 Nýggir vegir og<br>brýr, 31 Trygdartilt.,<br>33 Støm ábøtur,<br>35 Vegastokkur, 37<br>Studningsvegir:<br>Nye veje og broer,<br>udv. af broer m.v. | 40305 | 40000 | 30000 | 35000 |
| 13227 | Vegag. s. v. brennist.<br>Vej til forbrænd.anl. | 1525 | 0 | 0 | 0 |
| 13061 | Bergh.- og brúgvag.<br>Tunnel- og brobyg. | 30003 | 31000 | 31000 | 35000 |
| 13023 | Havnagerð | | | | |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Havnebygning | 95798 | 70000 | 70000 | 35000 |
| 13037 | Lendingar | | | | |
| | Landingspladser | 24718 | 26300 | 26300 | 20000 |
| 13042 | Flogferðsla | | | | |
| | Flyvetrafik | 1096 | 2500 | 2500 | 2500 |
| 13301 | Keyp av tyrlu | | | | |
| | Helikopter | 664 | | | |
| 13075 | Stuðul t. komm. | | | | |
| | t.asfaltering | | | | |
| | Tilsk. t. komm. til | | | | |
| | asfaltering | 6060 | 5500 | 5500 | 5500 |
| | Útvarpssendistøð | | | | |
| | Radiostation | 16000 | 7500 | 7500 | 6000 |
| **Íløgur** | | **216169** | **182800** | **172800** | **139000** |
| | | **385832** | **328050** | **294002** | **267850** |

| **Grein 14** | **Útbúgv. og gransking**<br>**Uddann. og forskn.** | **R 1991** | **J 1992** | **Endursk. 1992** | **J 1993** |
|---|---|---|---|---|---|
| 14053 | Felagsútr. f. skúlav. | | | | |
| | Fæll.udg. for skolev. | 1469 | 1300 | 1293 | 1500 |
| 14067 | Endurgj. fyri fjølrit | | | | |
| | Ref. til forfattere | 320 | 250 | 200 | 250 |
| 14103 | Fólkaskúlin | | | | |
| | Folkeskolen | 143562 | 140130 | 138703 | 145000 |
| 14117 | Skúlabarnaflutn. | | | | |
| | Transport af skoleb. | 3083 | 2500 | 2500 | 2500 |
| 14122 | Læraraeftirlønir | | | | |
| | Lærerpensioner | 10714 | 11000 | 11000 | 11000 |
| 14155 | HF-skeið í Suðuroy | | | | |
| | HF-kurs. på Suður. | 5131 | 5200 | 5178 | 5400 |
| 14169 | HF-skeið í Klaksvík | | | | |
| | HF-kursus i Klaksv. | 2860 | 2600 | 2600 | 2700 |
| 14174 | Eysturoyar stud.sk. | | | | |
| | og HF-skeið | | | | |
| | Eysturoy gymn./ | | | | |
| | HF-kursus | 11589 | 11300 | 11205 | 11205 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 14205 | Stud.sk. og HF-skeið í Hoydølum Hoydalar gymn./ HF-kursus | 20703 | 19320 | 19146 | 21000 |
| 14257 | Kostd. studentask. Gymn.kostafdeling | 2005 | 1700 | 1700 | |
| 14307 | Føroya sjómansskúli Færøerns Nav.skole | 6210 | 5600 | 5498 | 5500 |
| 14397 | Tekn. Sk. í Klaksvík Tekn. skole i Klaksv. | 4843 | 3800 | 3764 | 3764 |
| 14409 | Klaksv. Sjómanssk. Klaksv. Navig.skole | 2355 | 1900 | 1882 | 1882 |
| 14414 | Føroya Maskinskúli Før. Maskinskole | 7019 | 6800 | 6654 | 6800 |
| 14433 | Maskinútb. í Klaksv. Maskinudd. i Klaksv. | 180 | 360 | 180 | 0 |
| 14447 | Tekn. skúli í Tórsh. Tekn.skole i Tórsh. | 14836 | 12000 | 11493 | 11493 |
| 14466 | Skúlaheim í Klaksv. Kolleg. i Klaksvík | 1230 | 1230 | 1022 | 1022 |
| 14471 | Útgerð Tekn./ Handilsk./aðr.sk. Udstyr Tekn./Hande-lssko./andr | 872 | 800 | 800 | 800 |
| 14485 | Føroya Handilssk. Før. Handelsskole | 14000 | 14000 | 13897 | 14200 |
| 14499 | Føroya Læraraskúli Færøernes Seminar. | 10283 | 10500 | 10325 | 10325 |
| 14502 | Føroya Fólkahásk. Før. Folkehøjsk. | 2169 | 2288 | 2274 | 2274 |
| 14516 | Privatir skúlar Private skoler | 1139 | 1139 | 1139 | 1139 |
| 14554 | Húsarhaldsskúlar Husholdningssk. | 950 | 950 | 945 | 945 |
| 14604 | Frítíðarundirvís. Fritidsundervisn. | 5817 | 5800 | 5258 | 5300 |
| 14618 | Stuðul til musikksk. Tilsk. til musiksk. | 5196 | 4300 | 4300 | 4300 |
| 14656 | Landssmiðstøð f. | | | | |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | undirv. amboð | | | | |
| | | Landscentr. for undervisn.matr. | 2778 | 2800 | 2587 | 2600 |
| 14661 | | Fiskiídn. og havb. sk. í N.str. | | | | |
| | | Fiskeind. og hav-br.sk i N.st | 3068 | 3100 | 2950 | 2900 |
| 14675 | | Sjóvinnuskúli | | | | |
| | | Søfartsskole | 272 | 200 | 197 | 200 |
| 14725 | | Stórahús við Áir | | | | |
| | | Storehus við Áir | 512 | 500 | 300 | 200 |
| 14739 | | Seismisk. kann. | | | | |
| | | Seismiske unders. | 0 | 500 | 500 | 500 |
| 14744 | | Samarb. DGU/ Føroya Jarðfr.savn | | | | |
| | | Samarb. DGU/F. Jarðfrøðissavn | 845 | 845 | 845 | 845 |
| 14758 | | Fróðskapars. Før. | | | | |
| | | Fær. Akademi | 12960 | 11500 | 11255 | 11700 |
| 14763 | | Stovn á Debesartr., felagsútr. | | | | |
| | | Instit. på Debesart., fællesudg. | 1239 | 1350 | 1341 | 1341 |
| 14777 | | Biofar projektið | | | | |
| | | Biofar-projektet | 503 | 550 | 544 | 550 |
| 14796 | | Semámsfr. ráðg. | | | | |
| | | Specialundervisn. | 27844 | 27670 | 27565 | 27565 |
| 14808 | | Skúlabókaútgáva | | | | |
| | | Udg. af skolebøger | 4500 | 4300 | 4200 | 4200 |
| 14851 | | Útbúgvingarstuðul | | | | |
| | | Udannelsesstøtte | 37600 | 41700 | 40500 | 41700 |
| 14879 | | Skúlav., prógtøkur | | | | |
| | | Udarb. av eksamens-materiale | 2812 | 3000 | 3000 | 3000 |
| 14953 | | Ymiskir studningar | | | | |
| | | Diverser tilskud | | | | |
| | 313351 | Næmingastudn. t. listamenn | | | | |
| | | Tilsk. t. kunstner. uddannel. | 40 | 40 | 40 | 40 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 313376 | Meginfelag Før. studenta MFS | | | | |
| | MFS | 200 | 200 | 200 | 200 |
| | Næm.heim rakstrarst. | | | | |
| | Kollegier, driftstilsk. | 403 | | | 389 |
| 313406 | St.t.fremm. ið lesa í Føroyum | | | | |
| | Tilsk.til ikke-fær. | 35 | 35 | 35 | 35 |
| 313439 | Læruráðið (eftirútb. av yrkisl.) | | | | |
| | Lærerråd. (Efterudd. af håndv. | 292 | 350 | 350 | 350 |
| 313471 | Eftirútb. av sjóm. | | | | |
| | Efteruddannelse | 65 | 100 | 100 | 100 |
| 313613 | Dieselmotorsimulator | | | | |
| | Dielesm.simulat. | 0 | 548 | 548 | 548 |
| 323165 | Rakstur av bókamiðsøluni | | | | |
| | Driftstilsk. t.bókamiðsølan | 388 | 300 | 300 | 300 |
| | Føroyskur Eftirsk. í Danmark | | | | |
| | Fær. eftersk. i Danm. | | | | 250 |
| 373305 | Landsst. at ráða yvir | | | | |
| | Landsst. at råde over | 376 | 300 | 300 | 100 |
| **Rakstur** | | **375267** | **366655** | **360613** | **369912** |
| | L.miðst. Bókamiðs. Sk.b.gr. keyp | | | | |
| | Lands-,Bogcentr. Sk.b.fond køb | 0 | 0 | 0 | 0 |
| | Fólkask., nýbygg. | | | | |
| | Folkesk., nybyg. | 4677 | 9000 | 7000 | 6300 |
| | Sjóm. sk., umb./nb. | | | | |
| | Nav.sk., omb./nyb. | 28 | 200 | 200 | 0 |
| | Studentaskúli Hoydølum, umb. | | | | |
| | Gymn. i Hoyd. byg. | | 2000 | 2000 | 2000 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Studentask. og HF Kambsdali<br>Gymnasium og HF Kambsdali | 1500 | 9000 | 9000 | 10200 |
| | Lærara- og venjingarskúli<br>Lær. og Venjingarsk. | 600 | 0 | 0 | 0 |
| | Maskinskúli, nýb.<br>Maskinskole, nyb. | 2244 | 6000 | 0 | 8000 |
| | Fróðskaparsetur<br>Færøernes Akad. | 1130 | | | 1500 |
| | Brandskúlin<br>Brandskolen | 190 | 0 | 0 | 0 |
| | Fólkaháskúli, húsak.<br>Højskole, køb | | | | 275 |
| | Miðnámsskúli Suðuroy<br>Skole, Suðuroy | | 1500 | 1500 | 1500 |
| Íløgur | | **10369** | **27700** | **19700** | **29775** |
| | | **385636** | **394355** | **380313** | **399687** |

| **Grein 15** | **Mentan**<br>**Kultur** | **R 1991** | **J 1992** | **Endursk.**<br>**1992** | **J 1993** |
|---|---|---|---|---|---|
| 15109 | Landsbókasavn<br>Landsbibliotek | 4436 | 4119 | 4088 | 4502 |
| 15202 | Fólkabókasvn<br>Folkebibliotcker | 6001 | 5960 | 5923 | 5509 |
| 15304 | Landsskjalasavn<br>Landsarkiv | 2420 | 2162 | 2144 | 2144 |
| 15406 | Før. Fornminniss.<br>Fær. museum | 5136 | 4961 | 4923 | 4923 |
| 15508 | Bygdasøvn<br>Bygdemuseer | 1880 | 1600 | 1389 | 1389 |
| | Friðað hús og fornm.<br>Fredede bygninger | | | | 511 |
| 15601 | Útvarpið<br>Færøernes Radio | 0 | 0 | 0 | 0 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 15615 | | Sjónvarp Føroya<br>TV | 3500 | 3500 | 3476 | 3476 |
| 15629 | | Mentunargrunnur<br>Kulturfond | 1800 | 1800 | 1798 | 1800 |
| 15634 | | Føroyahús Kbh.<br>Fær. hus i Kbh. | 850 | 850 | 850 | 980 |
| 15703 | | Náttúrugripasavn<br>Naturhistorisk saml. | 3499 | 3500 | 3371 | 3471 |
| 15857 | | Náttúrufriðingarn.<br>Naturfredningsudv. | 268 | 250 | 200 | 250 |
| 15881 | | Mál- og navnan.<br>Sprog- og navnen. | 250 | 285 | 285 | 285 |
| 15895 | | Tónl. og sangur<br>Musik og sang | 500 | 500 | 500 | 500 |
| 15907 | | Ymiskir studningar<br>Diverse tilskud | | | | |
| | 323012 | Barnabløð<br>Børneblade | 100 | 100 | 100 | 100 |
| | 323037 | Leikpallur Føroya<br>Teater | 1700 | 1700 | 1700 | 1700 |
| | 323053 | Barnabókaútgáva<br>Børnebogsudgave | 1100 | 1100 | 1100 | 1100 |
| | 323086 | Sømdarp. t. skald og listafólk<br>Hædersg. t. digt- og kunstnere | 213 | 225 | 200 | 200 |
| | 323124 | Norðurlandahús<br>Nordens hus | 687 | 688 | 688 | 688 |
| | 323173 | Orðabókaútgáva<br>Udgiv. af ordb. | 12 | 250 | 250 | 250 |
| | 323236 | Listasøvn<br>Kunstsamlinger | 340 | 340 | 300 | 540 |
| | 323269 | Før-ísl-grønl.mentanarsamstarv<br>Før.-isl.-grønl. kultur.samarb. | 113 | 130 | 100 | 130 |
| | 373305 | Landsst. at ráða yvir<br>Landsst. at råde over | 219 | 220 | 200 | 500 |
| | 313384 | Norrøna felagið<br>Nordisk forening | 190 | 190 | 190 | 190 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | 313455 | Ungmannafelg og skótarørsla | | | |
| | | Ungdomsfor. og spejderbev.g. | 600 | 600 | 600 | 600 |
| | | Studn. t. pol. uppl. | | | | |
| | | Tils. t. polit. oplysningsarb. | 3500 | 3500 | 3000 | 3000 |
| | 15931 | Studn. til kirkjugr. | | | | |
| | | Tilsk. til kirkefond. | 3160 | 3000 | 3000 | 3000 |
| | | Kirkja Keypm. h. leiga av øki | | | | |
| | | Kirke i Københ., leje af grund | | | | |
| | 15959 | Studningur til ÍSF | | | | |
| | | Tilskud til ÍSF | 3200 | 3200 | 2900 | 3000 |
| | | Studn. til ferðir innanoyggja | | | | |
| | | Tilskud til rejser | 1603 | 1500 | 1500 | 1500 |
| **Rakstur** | | | **47277** | **46230** | **44775** | **46238** |
| | | Tjóðsavn, Náttúrugripasavn, nýb. | | | | |
| | | National museum/ Naturh.mus. nyb. | 0 | 400 | 0 | 400 |
| | | Prestag. Sandágerði, savn | | | | |
| | | Præsteg. i Sandág. | 987 | 600 | 600 | 500 |
| | | Listasavn Føroya | | | | |
| | | Fær. Kunstsamling | 823 | 1500 | 1500 | 1500 |
| | | St. t. bygdarh., nýb. | | | | |
| | | Tilsk. t. bygdeh. | 4030 | 4000 | 2600 | 1650 |
| | | Leguhús, Nesvík | | | | |
| | | Lejrsted i Nesvík | | 1000 | 1000 | 1783 |
| | | Savn Hoyvík, umv. | | | | |
| | | Museum Hoyv., nýb. | 0 | 400 | 400 | 400 |
| | | Landsskjalas., nýb. | | | | |
| | | Landsarkiv, nyb. | 0 | 1000 | 0 | 0 |
| | | Kirkjubømúr., umv. | | | | |
| | | Mur. i Kirkjub. rep. | 325 | 500 | 500 | 500 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Sjónvarp Føroya, nýb./umb. | | | | |
| | TV, nyb./omb. | 0 | 1000 | 400 | 2000 |
| | Bókasavnsskipanin | | | | |
| | Bibliotekscentral | | | | 300 |
| | Studningur t. ítróttar-bygging | | | | |
| | Byggetilsk. til idræt | 1000 | 4000 | 3050 | 4150 |
| | Grasvøllir | | | | |
| | Fodboldbaner | 2982 | 0 | 0 | 0 |
| | Graslíkisvøllir | | | | |
| | Kunstgræsbaner | 2400 | 1800 | 1500 | 1140 |
| Íløgur | | **12547** | **16200** | **11550** | **14323** |
| | | **59824** | **62430** | **56325** | **60561** |

**Viðm:** *Studningur til politiska upplýsing:* Henda upphædd verður eftir umsókn býttur millum politisku flokkarnar, ið aftan á hvørt løgtingsval eru umboðaðir á tingi og í mun til atkvøðutal flokkanna. Um tingmaður/menn fara úr einum flokki í valskeiðinum, skal upphæddin býtast í mun til tingmannatalið.

| **Grein 16** | **Fiskivinna, sigling o.t.** | | | **Endursk.** | |
|---|---|---|---|---|---|
| | **Fiskeri, søfart o.l.** | **R 1991** | **J 1992** | **1992** | **J 1993** |
| 16301 | Vaktar- og bjarging-artænastan | | | | |
| | Vagt- og bjærgn.tj. | 17110 | 17179 | 16864 | 16797 |
| 16367 | Bjargingarfeløg | | | | |
| | Redningsforen. | 180 | 180 | 180 | 180 |
| 16372 | Skipaskrá og -upp-máting | | | | |
| | Skibsregistrering | | | | |
| | og -opmåling | 702 | 700 | 700 | 700 |
| 1639 | Havbit Før. banka | | | | |
| | Opdrætsforsøg på | | | | |
| | Føroya Banki | | 600 | 600 | 600 |
| 16403 | Royndir innan havb. | | | | |
| | Fiskeopdrætsforsøg | 2880 | 3600 | 3600 | 3600 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 16422 | Lønjavningargr. | | | | |
| | Løngarantifonden | 5200 | 4800 | 4569 | 4500 |
| | Studn. til fiskiv. | | | | |
| | Tilsk.til fiskerierhv. | | 273000 | 251000 | 194000 |
| 16436 | Lógb.tr.(dagstudn. | | | | |
| | minstal. o.a.) | | | | |
| | Lovb. udg. (dagt.s., | | | | |
| | mindstel. m.v.) | 70000 | | | |
| 16441 | Studningar | | | | |
| | Tilskud | 280000 | | | |
| 16455 | Fiskiv.royndir u.f. | | | | |
| | landl. | | | | |
| | Fiskeriforsøg i fær. | | | | |
| | farvande | 10028 | | | |
| 16469 | Varðveiting av | | | | |
| | fjølbr. flota | | | | |
| | Bibcholdelse af | | | | |
| | differ.flåde | 14800 | | | |
| 16474 | Endurgj.upphøgg- | | | | |
| | ing gl.fiskisk. | | | | |
| | Ers.f.kondemn. | | | | |
| | gl.fiskefart. | 100805 | 0 | 0 | 0 |
| 16488 | Praktiskar fiskir. | | | | |
| | Prakt. fiskerifors. | 1973 | 5100 | 5100 | 5100 |
| 16493 | Hvalastøðin | | | | |
| | Hvalstationen | 37 | 60 | 60 | 60 |
| 16519 | Fiskirannsóknarst. | | | | |
| | Fiskeribiologisk | | | | |
| | laboratorium | 7290 | 6500 | 6256 | 6300 |
| 16607 | Fiskivinnur | | | | |
| | Fiskeriråd | 333 | 250 | 250 | 250 |
| 16626 | Magnus Heinason | | | | |
| | Magnus Heinason | 8938 | 8938 | 8680 | 8700 |
| 16645 | Sáttmálaeftirlit | | | | |
| | Konsulenter, vurd. | | | | |
| | af fartøjer | 515 | 300 | 295 | 200 |
| | Veðurfrøðingur | | | | |
| | Meteorolog | 373 | 500 | 500 | 500 |
| 16904 | Aðrir studningar | | | | |
| | Andre tilskud | | | | |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 333199 | Upplýs. um grind<br>Oplysning om grindehvalfangst | 468 | 160 | 160 | 260 |
| 333208 | Limagjald fleirtj. felagssk.<br>Medlems. i intern. fællessk. | 490 | 610 | 610 | 860 |
| 333408 | Tiltøk fyri aliv.<br>Tilt. vedr. fiskeopdr. | 4800 | 2000 | 2000 | 18000 |
| 373305 | Landsst. at ráða yvir<br>Landsst. at råde over | 699 | 300 | 300 | 400 |
| **Rakstur** | | **527621** | **324777** | **301724** | **261007** |
| | Fiskaal. v. Áir, nýb.<br>Fiskeopd. v. Áir, nyb. | 8464 | 9000 | 9000 | 13000 |
| | Vaktarskip, keyp/nýb./umb.<br>Kystvagt, køb/nyb./omb. | | | | 3000 |
| **Íløgur** | | **8464** | **9000** | **9000** | **16000** |
| | | **536085** | **333777** | **310724** | **277007** |

Avlop av stuðuli til fiskivinnuna í fíggjarárinum 1992 verður at flyta til sama rakstrarstað fíggjarárið 1993.

| **Grein 17** | **Laudbúnaður**<br>**Landbrug** | **R 1991** | **J 1992** | **Endursk. 1992** | **J 1993** |
|---|---|---|---|---|---|
| 17015 | Landsdjóralækna-embætið<br>Landsdyrlægeemb. | 3552 | 3351 | 3332 | 3340 |
| 17029 | Djóralæknatæn.<br>Dyrelægetjen. | | | | |
| 17034 | Fiskasjúkutæn.<br>Fiskesygetjeneste | | | | |
| 17048 | Landbúnaðarráðg.<br>Landbrugskonsul. | 245 | 417 | 414 | 414 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 17205 | | Royndarstøðin | | | | |
| | | Forsøgsstationen | 4683 | 4697 | 3668 | 3700 |
| 17219 | | Avloys.sk.f.mjólka-framl. | | | | |
| | | Ferieordn. for mælkeprod. | 580 | 580 | 580 | 580 |
| 17307 | | Skógrøkt landsins | | | | |
| | | Landets skovæs. | 1403 | 1492 | 1483 | 1483 |
| 17409 | | Fuglakanningar-støð v.m. | | | | |
| | | Ornitolog. stat. m.v. | 213 | 350 | 350 | 350 |
| 17502 | | Stuðul til ullavask. | | | | |
| | | Støtte til uldvask | | 800 | 600 | 600 |
| 17901 | | Aðrir studningar | | | | |
| | | Andre tilskud | | | | |
| | 343013 | Húsdjóraaling | | | | |
| | | Husdyrcopdrt | 154 | 154 | 154 | 54 |
| | | Landbúnaðarstudn: | | | | |
| | | Landbrugstilskud: | | 20100 | 19300 | 20000 |
| | | Nýdyrking | | | | |
| | | Nyopdyrkning | 2500 | | | |
| | | Studn. t. flegging landb. | | | | |
| | | Fin. tilsk. til landb. | 3500 | | | |
| | | Studn. til mjólkar-framl. | | | | |
| | | Tilskud til mælke-prod. | 12500 | | | |
| | | Studn. til súr-hoyggjabrunnar | | | | |
| | | Tilsk. til græssilo. | 300 | | | |
| | | Stráfóðurstudn. | | | | |
| | | Tilsk. til stråfoder | 1295 | | | |
| | 343038 | Rentustudn. t. land-búnaðarlán | | | | |
| | | Rentetilsk. til land-brugslån | 1000 | 1000 | 1000 | 1000 |
| | 343087 | Skeiðvirksemi | | | | |
| | | Kursusvirksomhed | 10 | 50 | 50 | 50 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 343117 | Vakstrarh., studn. Drivhuse, tilskud | 800 | 400 | 400 | 0 |
| 343133 | Studningur til kjøt Tilskud til kød | 2800 | 2500 | 2500 | 2500 |
| 343308 | Bjargarøkt Pasning af fuglefj. | 110 | 0 | 0 | 0 |
| | Stuðul til ull/ullaúrdr. Proj. vedr.bearbejdn. af uld | 200 | 0 | 0 | 0 |
| 373305 | Landsst. at ráða yvir Landsst. at råde over | 78 | 80 | 80 | 80 |
| **Rakstur** | | **35923** | **35971** | **33911** | **34151** |

| **Grein 18** | **Vinnulív og arheiðsmarknaður annars** | **R 1991** | **J 1992** | **Endursk. 1992** | **J 1993** |
|---|---|---|---|---|---|
| 18109 | Arbeiðseftirlit Arbejdstilsyn | 3633 | 3643 | 3616 | 3597 |
| 18152 | Brandvenjingarstøð við Áir Brandtræningsskolen við Áir | 250 | 200 | 200 | 200 |
| 18166 | Brunaumsjón Landsins Brandsikkerhedstilsyn | 487 | 510 | 510 | 510 |
| 18202 | Bileftirlit Biltilsyn | 1886 | 500 | 473 | 500 |
| 18216 | Radioeftirlit Radiotilsyn | 259 | 255 | 255 | 284 |
| 18235 | Ráð. fyri ferðslutr. Rådet for færdselssikkerhed | 961 | 961 | 954 | 960 |
| 18268 | Filmseftirlitið Filmtilsynet | 336 | 330 | 327 | 330 |
| 18318 | Semingsmannaskipan Forligsinstitution | 150 | 160 | 160 | 160 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 18323 | Studn. til kolagr. | | | | |
| | Tilsk. til kulminedr. | 635 | 400 | 400 | 400 |
| 18337 | Læruráðið | | | | |
| | Lærerådet | 1248 | 1066 | 1057 | 1057 |
| 18342 | Skeiðvirksemi | | | | |
| | Kursusvirksomhed | 20 | 50 | 50 | 50 |
| 18356 | Ferðamannamiðst. | | | | |
| | Turistcentralen | 3046 | 2984 | 2969 | 4200 |
| 18361 | Menningarstovan | | | | |
| | Kont. for industriel udvikl. | 1903 | 2703 | 2686 | 2618 |
| 18406 | Sjómansheim | | | | |
| | Sømandshjem | 300 | 300 | 300 | 200 |
| 18508 | Vestnordenprosj. | | | | |
| | Vestnordensproj. | 100 | 100 | 100 | 100 |
| 18513 | Menningargr. útn. | | | | |
| | Vestnordenfonden | 56 | 45 | 45 | 100 |
| 18527 | Menningargr. ídn. | | | | |
| | Til Udviklingsfond | 15000 | 12000 | 57988 | 18000 |
| 18532 | Stuðul til ídnaðarfr. endamál | | | | |
| | Støtte til industrifr. formål | 5100 | 8100 | 1600 | 4400 |
| | Farmafl.endurgj. | | | | |
| | Fragtrefusion | | 4700 | 2900 | 400 |
| | Tollendurgjald | | | | |
| | Toldrefusion | | 15000 | 10700 | 1100 |
| | Rentustudningur | | | | |
| | Rentetilskud | | 14500 | 7200 | 6600 |
| 18601 | Heilsufr. starvsst. | | | | |
| | Hygiejn. laborat. | 5189 | 5450 | 5406 | 5400 |
| | Góðskueftirlit | | | | |
| | Fiskekval.kontrol | 2232 | 2150 | 2131 | 2150 |
| 18653 | Orkuráðið | | | | |
| | Energirådet | 584 | 450 | 447 | 400 |
| 18667 | Orkuráðið, kanningarvirksemi | | | | |
| | Energirådet, unders. | 23 | 550 | 550 | 500 |
| 18703 | Tiltøk fyri ung | | | | |
| | Tiltag for unge | | | 4400 | 5000 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 18365 | | Javnstøðunevndin | | | | |
| | | Ligestillingsudv. | 194 | 200 | 200 | 170 |
| 18546 | | Stuðul t. Gistingar-húsgrunnin | | | | |
| | | Tilskud t. Hotellånef. | 1000 | 1000 | 0 | 1000 |
| | | Oljuviuna, kann. | | | | |
| | | Oljeudvind., unders. | | 500 | 500 | 500 |
| 18907 | | Aðrir studningar | | | | |
| | | Diverse tilskud | | | | |
| | 353067 | Studn. til læruplass | | | | |
| | | Tilsk. til lærepl. | 3102 | 1700 | 1700 | 1700 |
| | 353121 | Skeiðvirksemi til vinnufeløg | | | | |
| | | Kursusvirksomh. | 44 | 50 | 50 | 50 |
| | 353146 | Ferðaendurgjald til læruplass | | | | |
| | | Refusion t. lærepl. for rejs | 200 | 200 | 200 | 200 |
| | 373305 | Landsst. at ráða yvir | | | | |
| | | Landsst. at råde over | 120 | 130 | 130 | 130 |
| **Rakstur** | | | **48058** | **80887** | **110204** | **62966** |
| | | Stuð.t. umhvørvis-verndartiltøk | | | | |
| | | Tilskud t. miljøbesk. projekt | | 300 | 300 | 3500 |
| | | Hálkubreyt, Bileftir-lit, nýb. | | | | |
| | | Øvelseskørebane, | | | | |
| | | Biltilsyn, nyb. | 0 | 1500 | 0 | 1500 |
| | | Bileftirl., sýningarh. | | | | |
| | | Biltilsyn, kontrolst. | 200 | 0 | 0 | 0 |
| | | Ferðam.mist. Kristnastova,umb. | | | | |
| | | Turistcentralen, Kristnastova, omb. | 499 | 400 | 400 | 0 |
| 15806 | | Heilsufr. Starvs-stova, nýb. | | | | |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Hygiejn. laborat., nyb. | 354 | 1000 | 1000 | 1000 |
| **Íløgur** | | **1053** | **3200** | **1700** | **6000** |
| | | **49111** | **84087** | **111904** | **68966** |
| **Grein 19** | **Almannamál v.m.** | | | **Endursk.** | |
| | **Socialvæsen m.v.** | **R 1991** | **J 1992** | **1992** | **J 1993** |
| 19042 | Andveikraverndin, bústovnar | | | | |
| | Åndsvageforsorgen, boliger | 33546 | 36720 | 35866 | 37000 |
| 19056 | Fólkapensjón | | | | |
| | Folkepension | 228505 | 233400 | 233400 | 246300 |
| 19075 | Røktarheim | | | | |
| | Plejehjem | 79210 | 81000 | 79928 | 77000 |
| 19089 | Vistarheim fyri pensionistar | | | | |
| | Bol. for pension. | 5994 | 5949 | 5701 | 5705 |
| 19094 | Serviðb. t. ávísar pensiónistar | | | | |
| | Særtil. til pension. | 3 | | 0 | |
| 19106 | Avlamispensión | | | | |
| | Invalidepension | 92015 | 92000 | 92000 | 107800 |
| 19208 | Einkjubarnast. | | | | |
| | Børnebid. til enlige forsørg. | 4586 | 3840 | 3590 | 3590 |
| 19301 | Einkjupensjón | | | | |
| | Enkepension | 983 | 1070 | 920 | 920 |
| 19403 | Vanlig forsorg | | | | |
| | Almindelig forsorg | 84293 | 50000 | 95600 | 66000 |
| 19407 | Ym. forsorgarst. | | | | |
| | Forsk. forsorgsinst. | 14168 | 14806 | 14100 | 10600 |
| 19519 | Uppískoytisveiting | | | | |
| | Tillægsydelse | 587 | 820 | 670 | 400 |
| 19557 | Barnaforsorg | | | | |
| | Børneforsorg | 15642 | 14202 | 12620 | 14100 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 19607 | | Heimarøktarskip. | | | | |
| | | Hjemmeplejeordn. | 46086 | 49895 | 47469 | 49300 |
| | | Vardar íbúðir, stuð. til rakstur | | | | |
| | | Beskyttede boliger, dr.tilskud | | 200 | 200 | 300 |
| 19631 | | Dagstovnar | | | | |
| | | Daginstitutioner | 47513 | 52347 | 49518 | 52016 |
| 19659 | | Dagpeningaskip. | | | | |
| | | Dagpengeordning | 65288 | 66000 | 53500 | 44500 |
| 19664 | | Bjálv., hús hjá pensionistum | | | | |
| | | Isolering af pensionistboliger | 2000 | 2000 | 2000 | 2000 |
| 19678 | | Brennistudn. til pensionistar | | | | |
| | | Brændselstilskud til pensionister | 6558 | 6500 | 6500 | 6500 |
| 19683 | | Barnastyrkur | | | | |
| | | Børnetilskud | 12015 | 12000 | 12000 | 12000 |
| 19697 | | Sams. f. ans. eldri og óhj. heima | | | | |
| | | Vederl.for at passe ældre hjemme | 7342 | 8300 | 7400 | 7300 |
| 19868 | | Føroyingar á stovni í Danmark | | | | |
| | | Færinger på d. inst. | 20254 | 16750 | 16750 | 21400 |
| | | Kærun. og umsiting | | | | |
| | | Ankenævn og adm. | | | | 400 |
| 19892 | | Vanlukkutryggingarr. | | | | |
| | | Ulykkeforsikringsr. | 538 | 500 | 500 | 500 |
| 19904 | | Ymsir studningar | | | | |
| | | Forskellige tilskud | | | | |
| | 363382 | Møðrahjálp | | | | |
| | | Mødrehjælp | 0 | 200 | 200 | |
| | 363399 | Kreppumiðstøð | | | | |
| | | Krisecenter | 100 | 200 | 200 | 400 |
| | 363557 | Hús hjá deyvaf. | | | | |
| | | Døves foreningsh. | 560 | 560 | 560 | 560 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 363565 | Blindaheimið<br>Blindehjemmet | 3800 | 4000 | 3973 | 4000 |
| 363598 | Fráhaldsfelag<br>Blákrossstovan<br>Afholdsf. Blákross | 120 | 120 | 120 | 100 |
| 363603 | Styrkveiting<br>Understøttelse | 69 | 150 | 150 | 150 |
| 363628 | ALV<br>ALV | 350 | 350 | 350 | 350 |
| 363636 | Fráhaldsfeløg<br>Afholdsforeninger | 450 | 450 | 450 | 450 |
| 363644 | Reyði Krossur<br>Røde Kors | 30 | 30 | 30 | 30 |
| 363652 | Hjálpargr. fyri<br>óarb.førar fiskim.<br>Fonden f. uarbe-<br>jdsd. fiskere | 352 | 400 | 400 | 400 |
| 363669 | Fel.teirra brekaðu<br>Foren. handikapp. | 880 | 880 | 880 | 880 |
| 363707 | Arbeiðsl.gr. arb.fel.<br>Arbejderfore. ar-<br>bejdsløshedsf. | 500 | 0 | 0 | 0 |
| 363797 | Ráðg. fyri føroying-<br>ar Danmark<br>Rådg. for fær. i DK. | 445 | 460 | 460 | 460 |
| 363819 | Búst. fyri sinnisbr.<br>Instit. for sindslid. | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 363827 | Hjálpargr. móti<br>alkoh.misnýtslu<br>Hjælpef. mod alko-<br>holmisbrug | 6 | 1200 | 700 | 1000 |
| 363851 | Landsf. pensionist.<br>Pensionist. landsf. | 150 | 200 | 200 | 200 |
| 333104 | Trygdargr. f. avreið.<br>og lønir<br>Lønmodt. garantif. | 808 | 650 | 650 | 550 |
| 373305 | Landsst. at ráða yvir<br>Landsst.at råde over | 541 | 200 | 200 | 300 |
| **Rakstur** | | **776287** | **758349** | **779755** | **775461** |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Vardar íbúðir, Vágur | | | | |
| | Besk. pensionistb., Vágur | 1600 | | | 360 |
| | Bústovnar, serfors. | | | | |
| | Døgninstit., særfors. | 0 | 3000 | 407 | 4000 |
| | Dagh. Berjabr., nýb. | | | | |
| | Daginst., Berjabr. | 2397 | 4500 | 4500 | 8500 |
| | Uml.heim og búst., Suðuroy | | | | |
| | Døgninst., Suðuroy | 1500 | 1500 | 0 | 0 |
| | Búst., Eysturoy, nýb. | | | | |
| | Døgninst. Eyst., nyb. | 2005 | 0 | 0 | 0 |
| | Eysturoyar Røktarh. | | | | |
| | Eysturoy Plejehjem | 981 | | | |
| | Røktarh, Norð-streymoy, nýb. | | | | |
| | Plejehj., Norðstr., nybygning | 1000 | 1000 | 0 | 1000 |
| | Ellish. í Havn, umb. | | | | |
| | Alderdomshjem, Tórshavn, omb. | 400 | 0 | 0 | 0 |
| | Sandoyar Ellis- og røktarheim | | | | |
| | Sandoy alderd. og plejehjem | 12450 | 7800 | 6000 | 7656 |
| **Íløgur** | | **22333** | **17800** | **10907** | **21516** |
| | | **798620** | **776149** | **790662** | **796977** |

| | **Íbúðarmál** | **R 1991** | **J 1992** | **Endursk. 1992** | **J 1993** |
|---|---|---|---|---|---|
| 19956 | Húsalánsgr. Boliglånefondet | 0 | 10000 | 5000 | 5000 |
| 19961 | Íbúðargrunnur Boligfond | 0 | 1000 | 1000 | 1000 |
| 19975 | Rentustudn. til húsabygging | | | | |

| | | Rentetilskud t. hus-opsparing | 2003 | 1700 | 1700 | 2000 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstur** | | | **2003** | **12700** | **7700** | **8000** |

| **Grein 20** | **Eftirlønarútreiðslur** | | | **Endursk.** | |
|---|---|---|---|---|---|
| | **Pensionistudgifter** | **R 1991** | **J 1992** | **1992** | **J 1993** |
| 20013 | Eftirlønarútreiðslur | | | | |
| | Pensionsudgifter | | | | |
| 103558 | Eftirlønir | | | | |
| | Pensioner | 777 | 840 | 840 | 840 |
| 103599 | Danskar eftirlønir | | | | |
| | Danske pensioner | | | | 250 |
| 103612 | Biðipeningur | | | | |
| | Ventepenge | 4082 | 4400 | 4400 | 3100 |
| 103629 | Tænastum.eftirl. | | | | |
| | Tjenestem.pensi. | 6366 | 6900 | 6900 | 7000 |
| **Rakstur** | | **11225** | **12140** | **12140** | **11190** |

| **Grein 21** | **Effektiv. veðh.bind.** | | | **Endursk.** | |
|---|---|---|---|---|---|
| | **Effekt. garantiforpl.** | **R 1991** | **J 1992** | **1992** | **J 1993** |
| 21019 | Effektivar vehalds-bindingar | | | | |
| | Effektive garanti-forpligtelser | 167202 | 80000 | 190000 | 150000 |

| **Grein 22** | **Rentuútreiðslur** | | | **Endursk.** | |
|---|---|---|---|---|---|
| | **Renteudgifter** | **R 1991** | **J 1992** | **1992** | **J 1993** |
| | Rentuútreiðslur | | | | |
| | Renteudgifter | 202150 | 220000 | 220000 | 255000 |
| | Rentur av bundnari uppsparing | | | | |
| | Renter af bunden opsparing | 0 | 3000 | 3000 | 3000 |
| | | **202150** | **223000** | **223000** | **258000** |

| **Grein 26** | **Ymsar ognarútr.**<br>**Div. ejendomsudg.** | **R 1991** | **J 1992** | **Endursk.**<br>**1992** | **J 1993** |
|---|---|---|---|---|---|
| 26305 | Ymsar ognarútr.<br>Div. ejendomsudg. | 145 | 700 | 700 | 700 |

| **Grein 27** | **Óvissar útr.**<br>**Uvisse udg.** | **R 1991** | **J 1992** | **Endursk.**<br>**1992** | **J 1993** |
|---|---|---|---|---|---|
| 27005 | Óvissar útreiðslur<br>Uvisse udgifter | 20000 | 14000 | 0 | 20000 |

| **Rakstrarroknskapur**<br>**Driftsregnskap** | **Roknsk.**<br>**1991** | **Játtan**<br>**1992** | **Endursk.**<br>**1992** | **Játtan**<br>**1993** |
|---|---|---|---|---|
| **Inntøkur tilsamans**<br>**Indtægter ialt** | **2658452** | **2795255** | **2695755** | **2759005** |
| Rakstrarútr.(-rentuútr., veðh. og upphøgging) | | | | |
| Dr.udg. excl. gar.forpl.og kond. | 2434188 | 2312799 | 2282445 | 2237202 |
| Rentuútr.<br>Renteudg. | 202150 | 223000 | 223000 | 258000 |
| Upphøgging og eff. veðhaldsútr.<br>Garantiforpl. og kondemn. | 268007 | 80000 | 190000 | 150000 |
| Íløguútr. tilsamans<br>Investeringsudg. ialt | 292096 | 290600 | 255957 | 262714 |
| **Útreiðslur tilsamans**<br>**Udgifter ialt** | **3196441** | **2906399** | **2951402** | **2907916** |
| Úrslit av rakstri og íløgum<br>Resultat af drift og invest. | **-537989** | **-111144** | **-255647** | **-148911** |

**Gjaldførisroknsk.**
**Likviditetsbudget**

| | | **Nýútlán**<br>**Nyudlån** | **R 1991** | **J 1992** | **Endursk.**<br>**1992** | **J 1993** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | 333025 | St.lán t. fiski- og farmaskip | | | | |
| | | Tilsk.lån t.fiske- og fragtskibe | 10000 | 5000 | 5000 | 5600 |
| | | Likvidit.lán, fiski- og farmask. | | | | |
| | | Likvidit.lån,fiske- og fragtsk. | | | | 11300 |
| 14953 | 313152 | Gr. til útbúgving, nettotlán | | | | |
| | | Uddannelsesfond, nettoudlån | 8000 | 8000 | 8000 | 8000 |
| | | Lán til heilsumiðst. | | | | |
| | | Lån til sundhedsc. | | 3000 | 3000 | 5000 |
| | | **Nýútlán tilsamans**<br>**Nyudlån ialt** | **18000** | **16000** | **16000** | **29900** |
| | | Avdráttir av uttanlands láni | | | | |
| | | Afdrag på udenlandske lån | 31400 | 105500 | 105500 | 175000 |
| | | Afturgjald av bundnari uppsp. | | | | |
| | | Tilbagebet. af bunden opsp. | 0 | 95000 | 32000 | 32000 |
| | | Afturgj. av veksilsk. til Tjóðb. | | | | |
| | | Nedbet. af gæld til Nationalb. | | 100000 | 100000 | 100000 |
| | | Avdráttir av før. lánum | | | | |
| | | Afdrag på indenl. lån | | 28000 | 20000 | 73000 |
| | | Nýútlán og avdr., gjaldførisfrág. | | | | |
| | | Nyudlån og afdr., likv. træk | **31400** | **328500** | **257500** | **380000** |
| | | Inngj. av avdr., gjaldføristilg. | | | | |
| | | Indb. på lån, forøg. af likv. | **30800** | **39000** | **39000** | **30000** |
| | | Kapitalpostar tilsamans | | | | |
| | | Kapitalposter ialt | **-18600** | **-305500** | **-234500** | **-379900** |

| | Roknsk. 1991 | Játtan 1992 | 1992 Endursk. | Játtan 1993 |
|---|---|---|---|---|
| Broyting í gjaldføri, bruttolánitørvur | | | | |
| Ændr. i likv., lånebehov | **-556589** | **-416644** | **-490147** | **-528811** |

**Viðmerkingar:**

Í hesum framlagda fíggjarlógaruppskoti fyri 1993 eru inntøkurnar mettar til 2759 mió. kr. Rakstrarútreiðslurnar eru mettar til 2645 mió. kr., harav effektivar veðhaldsbindingar eru 150 mió. kr. Íløguútreiðslurnar eru 263 mió. kr. Uppsetingin av fíggjarlógini er broytt viðvíkjandi rentupostunum. Rentuinntøkurnar eru nú settar undir inntøkum á grein 6, meðan rentuútreiðslurnar eru settar á grein 22 undir útreiðslum.

Fíggjarlógin fyri 1992, sum upprunaliga javnvigaði við einum halli upp á 111 mió. kr., varð endurskoðað í mai í ár, og endurskoðaða fíggjarlógin javnvigar við 256 mió. kr. í halli.

Samanborið við endurskoðaðu fíggjarlógina 1992 síggja samandráttir av uppskotinum fyri 1993 soleiðis út:

| | Endursk. 1992 | Uppskot 1993 | Munur |
|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | 2.696 | 2.759 | 63 |
| Vanligar rakstrarútr. | 2.505 | 2.495 | 10 |
| | 191 | 264 | 73 |
| **Íløgur** | 256 | 263 | -7 |
| Úrslit áðrenn eff. veðhald | -65 | 1 | 66 |
| Effektiv veðhald | 190 | 150 | 40 |
| **Úrslit** | -255 | -149 | 106 |

Landsstýrið hevur lagt seg eftir, at hallið á fíggjarlógini ikki má verða størri enn útreiðslurnar til effektiv veðhald. Samlaðu landskassaveðhaldini fyri privatar fyritøkur eru nú komin niður á umleið 480 mió. kr. og við teim avsetingum, sum gjørdar eru á fíggjarlógini 1992 og 1993, tilsamans 340 mió. kr. má roknast við, at játtan landskassans til hetta endamál minkar munandi komandi ár. Hinvegin er tað týdningarmikið, at landsstýrið vísir vilja til at fáa landskassaroknskapin at vísa yvirskot, tá vit rokna veðhaldini frá.

Framlagda fíggjarlógaruppskotið er merkt av, at skattainntøkan er minkandi. Nakað av minkingini stavar frá lægri lønarútgjaldingum, serliga vegna minni fiskiskap í ár, men eisini frá rættiliga stórum frádráttum hjá persónum, sum hava havt kautiónstap. Hinvegin er roknað við nakað hægri toll- og avgjaldsinntøkum til landskassan, mest vegna nýggja meirvirðisgjaldið.

Umframt fígging til at rinda effektiv veðhald, skal landskassin rinda avdráttir av lánum í 1993. Aftast í fíggjarlógaruppskotinum er samlaði kapitaltørvurin til hesi endamál uppgjørdur til 518 mió. kr. Haraftrat kemur møguligur lánstørvur til óvissuna viðvíkjandi fíggjarlógargongdini restina av 1992.

Gjaldførið í føroyska samfelagnum er ógvuliga tepurt, og tí verða fáar íløgur gjørdar í løtuni. Landsstýrið tekur likviditetsstøðuna í stórum álvara og vil royna at útvega samfelagnum meira likviditet, møguliga gjøgnum landsbankan. Men ásannast má, at hetta er trupult, tí uttanlands lánsskuld føroyinga var vorðin so høg, at okkara verandi gjaldsjavnayvirskot verður nýtt - og má fyri ein stóran part nýtast - til at rinda burtur av hesi skuld.

Lækkandi fiskaprísir - umframt minkandi fiskiskap - hava í ár hindrað ella seinkað eini búskaparligari framgongd. Men útlit eru til frægari prísir aftur, og tað, at eksportprísirnir á laksi eru uppfarnir, gevur vón um ávísa framgongd aftur, og nakað meira av búskaparligum rensli við harav fylgjandi virksemi.

Sum vanligt er, verða fylgiskjøl til fíggjarlógina hjáløgd framløguni, men einstakar viðmerkingar eru eisini til serstøk rakstrarstøð:

**1201. Vanligur landsskattur:** Inntøkuskatturin er settur til 850 mió. kr., sum er 91 mió. kr. minni enn mett á endurskoðaðu fíggjarlógini fyri 1992. Partafelagsskatturin er bert mettur til 11 mió. kr. Ætlanin er eisini at gera ymiskar broytingar í skattalóggávuni.

**2017. Tollgjøld og Meirvirðisgjald:** Henda inntøkan er torfør at meta um, tí nýggj skipan kemur í gildi 1. januar 1993. Eftir ymiskum kanningum verður eftir bestu sannføring mett, at meirvirðisgjaldið gevur umleið 535 mió. kr. Nakrir av teim serkønu meta tølini hægri, og kanska væl hægri, meðan aðrir meta tey heldur lægri. Punktgjøldini svara til tað, sum væntandi kemur inn í 1992, tó minkað umleið 10%.

**Grein 6. Landsfyritøkur.** Tær fyritøkur, sum áður hava verið tiknar við her, men sum ikki rinda landskassanum avlopið ella part av tí, eru ikki við longur.

Harafturímóti eru tvær nýggjar fyritøkur - Rúsdrekkasøla Landsins og Landsbankin - settar á hesa grein. Hesir stovnar skulu rinda landskassanum part av sínum avlopi.

**Grein 12, Heilsumál.**

**12007 Sjúkrakassar:** Til tess at halda játtanina, verður neyðugt við lógarbroyting, har m. a. endurgjaldsskipanin verður umskipað. Brúkaragjaldið vil av hesi orsøk hækka. Møguligt er at bøta um hetta við at broyta vinningskunngerðina fyri apoteksverkið.

**Heilbrigdið:** Skal Heilbrigdið rekast sum ein stovnur, krevur danska almannaráðið, at hetta verður ein føroysk útreiðsla burturav, t.v.s. at danska endurgjaldið upp á 25 prosent dettur burtur.

Royndirnar í ár, har almannaverkið keypir tænastuna samb. grein 15 í forsorgarlógini frá Heilbrigdinum, hava víst seg sera truplar umsitingarliga.

Møguleiki er í sjúkrahúslógini at reka ein slíkan stovn. Tá ber til við m.a. reglugerð at hava neyvt eftirlit við rakstrinum.

**Grein 16, Fiskivinna o.a.**

**Tiltøk til alivinnuna.** Landsstýrið hevur samtykt at verða við til at stuðla samtakinum P .O. (produsentorganisatión), um alararnir fara at gjøgnumføra tað,: landsstýrið ætlar at gjalda fasta upphædd í grunnin heldur enn eitt ávíst prosentgjald av útflutningsvirðinum, sami grunnur kemur eisini at virka sum trygdargrunnur. Tvær til tríggjar milliónir av upphæddini fer landsstýrið at nýta til tiltøk hjá alivinnuni, sjúkrafyribyrging, royndir at sleppa longur út móti havi og kortleggja hesi við neyðugum upplýsingum.

**Grein 17, Landbúnaður:**

**17205 Royndarstøðin:** Landsstýrið ætlar at leggja raksturin á royndarstøðini soleiðis til rættis, at játtanin heldur. Ávísir partar av broytingini hanga saman við nýsetan av landbúnaðarráðgeva.

**Grein 18. Vinnulív og arbeiðsmarknaður:**

**Tiltøk fyri ung:** Tann bólkurin, sum við galdandi skipanum á arbeiðsloysisøkinum er uttan trygdarskipan, er serliga bólkurin av ungum millum 16 og 18 ár.

Við hesi játtan er ætlanin at gera nakrar royndir fyri hesum aldursbólki við tiltøkum sum arbeiðstilboð, aspirantskipan og útbúgving.

**Grein 19. Almannamál.**

**19075 Røktarheim:** Heimini á Sandi og í Skopun lata upp 1. apríl 1993. Teir sandoyingar (5 í tali), sum í løtuni eru á røktardeildini á landssjúkrahúsinum flyta tá suður.

Røktarheimið í Vágum, har umleið 10 pláss eru tøk, verður í fyrsta lagi at hýsa fólki úr Norðstreymoy.

**19106 Avlamispensjón.**
Orsakað av arbeiðsloysinum nýta fleiri rættin til fulla avlamispensjónsupphædd. Í játtanini er ætlað, at einir 25 persónar í samband við upprættan av grein 32: Búfelagskapur, fáa avlamispensión útgoldna.

**19607 Heimahjálparaskipanin.**
Tá røktarheimini á Sandoynni lata upp 1. apríl 1993, letur sambýlið í Húsavík aftur. Ætlanin er tá at lata eitt eldrasambýli upp í Norðurstreymoy.

**Kærunevnd og umsiting.**
Nú heimildirnar til eina kærunevnd í almannamálum eru fingnar til vega, er ætlanin, at henda kærunevnd fær sína egnu umsiting.

Neyðugt verður, at ein fulltrúi fyrireikar tey mongu málini.

**19556 Húsalánsgrunnurin.**
Við hesi játtan verður neyðugt við broytingum (rentu og avdráttartíð) av nýggjum og játtaðum lánum. Møguleiki er fyri, at tey, sum sita við høgu húsaútreiðslunum (bygt í 80-unum) verða hildin uttanfyri.

**Grein 27: Óvissar útreiðslur:**
Upphæddin er í høvuðsheitum ætlað at býta millum ymsu almennu stovnarnar, í samband við at ávísir stovnar fáa størri útreiðslur til keyp av ymsum vørum og tænastum, orsakað av nýggju meirvirðisgjaldsskipanini.

# 9. Broyting í løgtingslóg um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m.

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m.*

*lagtingslov om ændring i lagtinslov om garantifond for fiskeindhandlinger og løn m.v.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 68 frá 9. juni 1988 um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m. við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 68 af 9. juni 1988 om garantifond for fiskeindhandlinger og løn m.v. med senere ændringer:

1) § 1, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"Treytin fyri at fáa pening úr grunninum fyri krøv í samband við avreiðingar er, at avreiðingin er gjørd seinastu 30 dagarnar áðrenn freistardagin. Freistardagurin verður at skilja sum seinasti dagurin, virkið hevur tikið í móti fiski. Skip og bátar, sum koma undir hesa lóg og hava mist pening í hesum árinum, hava eina fráboðanarfreist til grunnin upp á 4 vikur eftir, at henda lógarbroyting er lýst at galda."

1) § 1, stk. 2, affattes således:
"Betingelsen for at der kan foretages udbetaling af fondens midler for krav i forbindelse med indhandling er, at indhandlingen er sket indenfor de seneste 30 dage før fristdagen. Fristdagen defineres som den sidste dag, virksomheden har taget imod fisk. Skibe og både, der omfattes af denne lov, og som har tabt penge i indeværende år, har en meddelelsesfrist til fonden på 4 uger efter, at denne lovændring er kundgjort."

2) § 1, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"Upphæddin, sum latin verður fyri avreiðingar, skal samsvara við avreiðingarvirðið."

2) § 1, stk. 3, affattes således:
"Beløbet, der ydes før indhandlinger, skal modsvare indhandlingsværdien."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

**Viðmerkingar:**

Trygdargrunnurin fyri avreiðingar og lønir hevur verið galdandi í mong ár. Í løtuni er løgtingslóg nr. 68 frá 9. juni 1988 við seinni broytingum í gildi.

Lógin er seinast broytt tann 8. mai 1991. Tá varð inngjaldið hjá arbeiðsgevarunum hækkað samstundis sum minkað varð um útgjaldsskyldumar hjá grunninum. Hetta varð gjørt fyri at bøta um fíggjarstøðuna hjá grunninum soleiðis, at hann gjørdist førur fyri at svara hvørjum sítt.

Lógarbroytingin í 1991 hevði eisini við sær, at tey, sum høvdu lønarkrøv í samband við brot av arbeiðsavtalu, ikki longur fingu úr grunninum. Sagt varð tá, at hesin partur fevndi um helvtina av útgjaldingunum úr grunninum.

Hin stóra broytingin var, at fiski- og útróðrarpartar, báta- og skipspartar blivu skomir niður til í mesta lagi at fáa helvtina av tí, teir høvdu mist. Áður høvdu teir fingið alt. Sett varð í lógina, at avreiðingin ikki mátti vera meira enn 14 dagar eldri enn ásetti freistardagurin.

Vanliga avrokna virki (tá gjaldførið er í lagi) seinast í vikuni fyri avreiðingar í undanfarnu viku. Útróðrarbátar verða eisini avroknaðir fyri 14 dagar triðju hvørja viku. Fyri skip eru avrokningarhættirnir ymiskir, men sum oftast ganga 14 dagar og meira, fyrr enn tey fáa sín pening.

Kemur eitt virki í gjaldføristrupulleikar, kemur útgjaldingin til teir, sum avreiða, altíð í afturhond. Um eitt virki steðgar upp, eru helst altíð meiri enn 14 dagar gingnir, síðani tað er givist við at innhandla fisk, og til tað verður lýst konkurs.

Við seinastu broyting í lógini er trygdin fyri avreiðingar í veruleikanum burtur - bæði fyri før og manning. Tað man neyvan hava verið ætlan landsstýrisins og løgtingsins. Tí verður skotið upp at definera freistardagin soleiðis, at freistardagurin er tann dagur, tá fiskavirkið seinast innhandlaði fisk, at avreiðingin skal verða gjørd seinastu 30 dagarnar, áðrenn freistardagin, at upphæddin verður øll avreiðingin, og at henda broyting verður at galda frá 1. januar 1992.

Inntøkan hjá trygdargrunninum verður í ár umleið 6,5 mió. kr. Higartil eru longu 5 mió. kr. útgoldnar, so eitt er at ivast í, at grunnurin fer ikki at røkka sínar skyldur, nú fleiri virki standa til at fara av knóranum.

Byrðarnar hjá virkjunum eru frammanudan ov høgar, so ikki er ráðiligt at hækka inngjaldið hjá arbeiðsgevarunum. Mælt verður tí til, at neyðugi peningurin verður tikin av óbrúktum konti undir § 16.

# Álit

# í

*løgtingsmáli nr. 9/1992: Broyting í løgtingslóg um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m.*

Málið er lagt fram av Jógvan I. Olsen, løgtingsmanni, tann 31. august 1992 og eftir 1. viðgerð tann 21. oktober 1992 beint í arbeiðaramálanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Sverre Midjord, Hergeir Nielsen, Asbjørn Joensen og Birgir Danielsen) tekur ikki undir við uppskotinum í tí líki, tað er sett fram, og leggur nevndi meiriluti dent á, at tá talan er um eina óhepna rættarstøðu, er neyðugt, at landsstýrið tekur upp málið til positiva viðgerð og setir tí fram soljóðandi:

# Uppskot

# til

# samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at fara undir at tilevna hetta lógarverk soleiðis, at øll, ið arbeiða á landi og á sjógvi, skulu verða líka fyri lógini, serliga tá talan er um fyrningarfreist og ágóða.

Minnilutin (Jógvan I. Olsen) førir fram, at tá lógin um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m. seinast bleiv broytt 8. mai 1991, bleiv trygdin fyri avreiðingar skorin niður til, at í mesta lagi kundi fáast helvtin av tí, ið mist var, og at avreiðingin ikki mátti vera meira enn 14 dagar eldri enn ásetti freistardagurin.

Viðvíkjandi lønum á landi skuldu fólk fáa alt tey høvdu mist, upp til kr. 70.000 í part, og at lønirnar kundu verða upp til 180 dagar eldri enn ásetti freistardagurin.

Við hesi broyting kom stórt sæð trygdargrunnurin bert at galda fyri lønir á landi, meðan trygdin fyri avreiðingar í veruleikanum bleiv útihýst í lógini, og kortini skuldu skip og bátaeigarar gjalda inn í grunnin.

Sostatt fekk fiskivinnan ein tryggingargrunn, sum álegði henni skyldur at gjalda inn í grunnin, meðan hon ikki fekk rætt til at fáa nakað útaftur.

Eina slíka órættvísa lóg kann løgtingið ikki verða tjent við, og fyriliggjandi uppskot er sett fram fyri at bøta um tann órætt, fiskivinnuni hevur verið fyri serliga tað seinasta árið, hvar nógv fiskavirkir eru uppsteðgað, og fiskiskip hava mist pening.

Føroya Reiðarafelag hevur upplýst 3. mai 1993, at mistur peningur fyri avreiðingar er í 1992 kr. 2.269.000 og í 1993 kr. 1.255.000.

Líkningarráð Føroya hevur 18. september 1992 upplýst, at útgoldið úr trygdargrunninum er fyri avreiðingarnar

| | | |
|---|---|---|
| Tíðarskeiðið | 01.01.88 - 08.05.91 ..... | kr. 1.119.038 |
| - | 08.05.91 - 18.09.91 ..... | kr. 229.644 |
| - | (08.05.91 kom seinasta broytingin í gildi.) | |

Grunnurin hevur goldið heilar 26,3 mió. kr. út til løntakarar á landi.

Fyri at minka um upphæddina hjá trygdargrunninum til útgjaldingarnar fyri avreiðingar setir nevndi minniluti fram soljóðandi:

**broytingaruppskot**

**til**

**fyriliggjandi lógaruppskot**

| | |
|---|---|
| **1)** Í § 1, pkt. 1 ganga út orðini "í hesum árinum". | **1)** I § 1, pkt. 1 udgår ordene "i indeværende år". |
| **2)** § 1, pkt. 2 verður orðað soleiðis:<br>§ 1, stk. 2 verður orðað soleiðis:<br>"Upphæddin, sum latin verður fyri avreiðingar, er 80% av avreiðingarvirðinum, tó í mesta lagi kr. 300.000 fyri hvørt fiskifar". | **2)** § 1, pkt. 2 formuleres således:<br>"§ 1, stk. 2 affattes således:<br>"Beløbet, der ydes for indhandlinger, udgør 80% af indhandlingsværdien, dog ikke over kr. 300.000 pr. skib": |
| **3)** § 2 verður orðað soleiðis:<br>"Henda lóg fær gildi frá 1. januar 1992." | **3)** § 2 formuleres således:<br>"Denne lov har gyldighed fra 1. januar 1992." |

# 10. Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m.

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 68 frá 9. juni 1988 um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m. við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1 verður orðað soleiðis:

"Trygdargrunnur verður stovnaður fyri at tryggja løntakarum lønarkrøv, herundir fiski- og útróðrarpartar, og føroyskum skipa/bátaeigarum part av avrokning fyri fisk avreiddan til føroysk fiskavirki í samband við:

1. at arbeiðsgevarin ella fiskavirkið eru komin í fíggjartrot,
2. at arbeiðsgevarin doyr, og búgvið verður tikið til skiftiviðgerðar eftir 3. kap. í skiftilógini, ella
3. at fyritøkan heldur uppat, og tað verður sannað, at arbeiðsgevarin er ikki førur fyri at rinda kravið.

Stk. 2. Treytin fyri at fáa pening úr grunninum fyri krøv í samband við av-

*lagtingslov om ændring i lagtingslov om garantifond for fiskeindhandlinger og løn m.v.*

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 68 af 9. juni 1988 om garantifond for fiskeindhandlinger og løn m.v. med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) § 1 affattes således:

"Garantifond oprettes til sikring af lønmodtageres krav på løn, herunder indtægter ved partfiskeri og færøske skibs/bådejeres del af afregning for fisk, der er indhandlet til færøske fiskevirksomheder ved:

1. arbejdsgiverens eller fiskevirksomhedens konkurs,
2. arbejdsgiverens død, såfremt boet behandles efter skiftelovens kap. 3, eller
3. virksomh. ophør, såfremt det godtgøres, at arbejdsgiveren er ude af stand til at betale kravet.

Stk. 2. Betingelsen for at få godtgørelse fra fonden for krav i forbindelse

reiðingar er, at avreiðingin er gjørd seinastu 14 dagarnar áðrenn freistdagin.

**Stk. 3.** Upphæddin, sum latin verður fyri avreiðingar, kann í mesta lagi vera 50% av avreiðingarvirðinum.

**Stk. 4.** Treytin fyri at fáa pening úr grunninum fyri lønarkrøv er, at lønin er vunnin seinastu 30 dagarnar áðrenn freistdagin.

**Stk. 5.** Krøv mótvegis grunninum í samband við frítíðarløn skulu vera vunnin seinastu 6 mánaðirnar áðrenn freistdagin.

**Stk. 6.** Landsstýrið ásetir nærri reglur um, hvørjar avreiðingar og hvørji fiskavirki koma undir hesa lóg."

med fiskeindhandlinger er, at indhandlingen er foretaget de seneste 14 dage inden fristdagen.

**Stk. 3.** Godtgørelsen for indhandlinger kan højst udgøre 50% af indhandlingsværdien.

**Stk. 4.** Betingelsen for at få penge fra fonden for lønkrav er, at lønnen er indtjent de seneste 30 dage inden fristdagen.

**Stk. 5.** Krav mod fonden i forbindelse med ferieløn skal være indtjent de seneste 6 måneder inden fristdagen.

**Stk. 6.** Landsstyret fastsætter nærmere regler for, hvilke indhandlinger og hvilke fiskevirksomheder denne lov omfatter."

2) § 2, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"Umframt part av avrokning til skipa/bátaeigarar fyri fisk, avreiddan til føroysk fiskavirkir, fevnir trygdin um lønarkrøv og krøv um frítíðarløn, um so er, at krøvini, jbr. tó § 1, stk. 4 og 5, eru ella í konkursi vildu komið undir § 95, stk. 1, nr. 1, 4 og 5 (í nr. 5 tó bert tey krøv, sum í konkursi vildu komið undir § 95, stk. 1, nr. 1), jbr. stk. 2 í konkurslógini. Trygdin fevnir eisini um tílík krøv, sum koma undir § 94, nr. 2 í konkurslógini, um so er, at skiftirættin í skiftisviðgerðini váttar, at konkurs- ella deyðsbúgvið ikki er ført fyri at rinda krøvini."

2) § 2, stk. 1 affattes således:

"Foruden del af afregning til skibs/bådeejere for fisk, der er indhandlet til færøske fiskevirksomheder, omfatter garantien krav på løn og feriegodtgørelse, såfremt kravene, jfr. dog § 1, stk. 4 og 5, er eller i tilfælde af konkurs ville være omfattet af § 95, stk. 1, nr. 1, 4 og 5 (i nr. 5 dog kun de krav, som er eller i tilfælde af konkurs ville være omfattet af § 95, stk. 1, nr. 1), jfr. stk. 2 i konkursloven. Garantien omfatter tillige tilsvarende krav, der kan støttes på konkurslovens § 94, nr. 2, såfremt den skifteret, der behandler konkursboet eller dødsboet, attesterer, at boet ikke er i stand til at betale kravene."

3) § 3 verður orðað soleiðis:

"Fyri tey krøv, sum nevnd í kon-

3) § 3 affattes således:

"For krav, der er nævnt i kon-

kurslógini § 94, nr. 2 og § 95, stk. 1, nr. 1 og 5 (í nr. 5 tó bert tey krøv, sum í konkursi vildu komið undir § 95, stk. 1, nr. 1) í konkurslógini, kann grunnurin í tí einstaka førinum rinda í mesta lagi 20.000 kr. til hvønn løntakara. Landsstýrið kann í kunngerð hækka hesa upphædd."

kurslovens § 94, nr. 2 og § 95, stk. 1, nr. 1 og 5 (i nr. 5 dog kun de krav, som er eller i tilfælde af konkurs ville være omfattet af § 95, stk. 1, nr. 1), kan fonden i det enkelte tilfælde højst udbetale 20.000 kr. til hver lønmodtager. Landsstyret kan i bekendtgørelse forhøje dette beløb."

**§ 2.**

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Stk. 2.** § 1, stk. 4 og 5 og § 3 fáa gildi dagin eftir, at henda lóg er kunngjørd og fevna um krøv, har freistdagurin ella tann dagur, sum sambært § 2, stk. 2 kemur í staðin fyri freistdagin, er tann dagur lógin er kunngjørd ella seinni.

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

**Stk. 2.** § 1, stk. 4 og 5 og § 3 træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen og omfatter krav, hvor fristdagen eller den dag, som i henhold til § 2, stk. 2 kommer i stedet for fristdagen, er den dag, loven er bekendtgjort eller senere.

**Viðmerkingar:**

Í fjør samtykti løgtingið at broyta lógina um Trygdargrunnin fyri Avreiðingar og Lønir v.m. soleiðis, at gjøldini til grunnin vórðu hækkað samstundis, sum avmarkingar vórðu gjørdar í útgjaldingunum. Hetta varð mett at geva grunninum betri gjaldføri. Økta talið á trotabúgvum hevur ført við sær, at krøvini móti grunninum hava verið og eru alsamt vaksandi.

Støðan hjá grunninum í dag er hon, at krøvini móti grunninum eru eins stór og tøki peningur grunnsins.

Vísandi til, at grunnurin við eini inntøku upp á umleið 6 mió. kr. árliga ikki er førur fyri at virka eftir lógini, skjýtur landsstýrið upp at broyta lógina soleiðis, at tíðarskeiðið fyri lønarkrøv verður avmarkað úr 6 mánaðum niður í seinastu 30 dagarnar áðrenn freistdagin, og at tíðarskeiðið fyri krøv um frítíðarløn verður avmarkað til seinastu 6 mánaðirnar áðrenn freistdagin. Til tess at røkka so nógvum løntakarum sum gjørligt, skjýtur landsstýrið upp at lækka útgjaldingarupphæddina úr 70.000 kr. til í mesta lagi 20.000 kr. umfram frítíðarløn.

Víst verður annars til serligu viðmerkingarnar niðanfyri og til skriv frá Trygdargrunninum fyri Avreiðingar og lønir v.m.

**Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:**

**Ad § 1, stk. 4.** Henda broyting førir við sær, at tíðarskeiðið fyri løuarkrøv, sum áður sambært reglunum í konkurslógini var 6 mánaðir, nú er sett niður í 30 dagar.

**Ad § 1, stk. 5.** Sambært § 17 í lógini um frítíð við løn kann tíðarskeiðið fyri frítíðarløn verða upp til 23 mánaðir. Landsstýrið skjýtur tí upp, at hetta tíðarskeið í samband við útgjaldingar úr trygdargrunninum verður avmarkað til seinastu 6 mánaðirnar áðrenn freistdagin.

**Ad § 2, stk. 1.** Her verður skotið upp, at ásetingin um krøv, sum nevnd eru í § 63, stk. 2 í konkurslógini verður strikað.

**Ad § 3.** Broytingin í hesi áseting førir við sær, at grunnurin í mesta lagi kann gjalda 20.000 kr. til hvønn løntakara umfrumt frítíðarløn. Í verandi lóg er henda upphædd í mesta lagi 70.000 kr. umframt frítíðarløn.

## Álit

í

*løgtingsmáli nr. 10/1992: Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 31. august 1992 og eftir 1. viðgerð tann 21. oktober 1992 beint í arbeiðaramálanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og fingið upplýsingar um útgjaldingar úr trygdargrunninum frá Líkningarráð Føroya, Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Reiðarafelag.

Arbeiðaramálanevndin hevur sent landsstýrinum málið við ávísum spurningum og í skrivi frá 16. mars 1993 hevur landsstýrið sent lógaruppskotið aftur óbroytt til arbeiðaramálanevndina.

Landsstýrið viðmerkir, at uppskotið er tilevnað í samráð við tey fólk, sum umsita trygdargrunnin, og grunnurin hevur ikki ráð til at gjalda meir út enn tað, sum er sett fram í lógaruppskotinum. Til spurningin, um krøv í samband við avreiðingar skulu hækkast frá 14 døgum til 30 dagar, sigur landsstýrið, at nevndin sjálv má taka avgerð um.

Arbeiðaramálanevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 29. apríl 1993 og er semja í nevndini um, at dagatalið upp á 14 í § 1, stk. 2 skal hækkast til 30 dagar, og fer nevndin at seta fram broytingaruppskot hesum viðvíkjandi.

Nevndin hevur spurt seg fyri, hvør tann neyvi løgfrøðiligi týdningurin er av orðinum "freistdagurin", og er upplýst, at talan er um § 1, stk. 1 í konkurslógini, ið er soljóðandi: § 1. Ved fristdagen forstås i denne lov:

1) den dag, da skifteretten modtog anmeldelse om betalingsstandsing eller begæring om akkordforhandling, gældssanering eller konkurs.
2) dagen for skylderens død, såfremt dødsboet behandles efter reglerne i denne lov,
3) dagen for beslutningen om likvidation af et aktieselskab eller anpartsselskab, hvis skifteretten inden tre måneder efter denne beslutning modtager anmeldelse om betalingsstandsning eller begæring om akkordforhandling eller konkurs, eller det tidligste af de nævnte tidspunkter.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Sverre Midjord, Hergeir Nielsen, Asbjørn Joensen og Birgir Danielsen).

Samsvarandi tí sum omanfyri er víst á, setir nevndi meiriluti fram:

**broytingaruppskot**

**til**

**uppskot landsstýrisins**

| | |
|---|---|
| Í § 1, stk. 2 verður í staðin fyri "14" sett "30". | I § 1 stk. 2 indsættes i stedet for "14" "30". |

Minnilutin (Jógvan I. Olsen) tekur ikki undir við málinum.

# 11. Broyting av løgtingslóg um minstuløn, dagstudning og minstaforvinning

**Uppskot**

**til**

*broyting av løgtingslóg um minstuløn, dagstudning og minstaforvinning.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 32 frá 27. mars 1992 um minstuløn, dagstudning og minstaforvinning verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 3, nr. 3) litra a verður orðað soleiðis:
"At viðkomandi ikki hevur meira enn 50% av inntøku síni síðstu 6 mánaðirnar frá øðrum enn útróðri. Tá prosenttalið verður roknað, verður upp í inntøkuna roknað øll skattainntøka, tímalønt inntøka á løggildum flakavirki tó undantikin, og harumframt allar almannaveitingar."

2) § 5, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Minstiforvinningur til manningar á útróðrarførum er kr. 958,93 fyri túrin og til manningar á útróðrarførum, sum royna við snøri ella snellu, er minstiforvinningurin kr. 479,46 fyri dagin."

*ændring af lagtingslov om mindsteløn, dagstøtte og mindsteindtægt.*

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 32 af 27. marts 1992 om mindsteløn, dagstøtte og mindsteindtægt foretages følgende ændringer:

1) § 3, nr. 3) litra a affattes således:
"At vedkommende ikke har mere end 50% af sin indtægt de sidste 6 måneder fra andet end hjemmefiskeri. Når procentsatsen bliver udregnet, medregnes i indtægten den skattepligtige indtægt, undtaget timelønnet indtægt på autoriseret filetfabrik, og desuden alle offentlige ydelser."

2) § 5, stk. 1 affattes således:
"Mindsteindtægten til mandskab på fartøjer, som fisker med langline, er kr. 958,93 for fisketuren og til mandskab på fartøjer, som fisker med snøre eller snelle, er mindsteindtægten kr. 479,46 for dagen.

| § 2. | § 2. |
| --- | --- |
| Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. | Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen. |

**Viðmerkingar:**

Seinast lógin um minstaforvinning varð broytt, varð sagt frá, at um broytingin fór at geva útróðrarmanninum trupulleikar, fór landsstýrið at taka málið aftur til viðgerðar. Ætlanin við hroytingini var at koma ovnýtsluni til lívs og ikki at revsa útróðramenn, sum lógin varð gjørd til.

Eftir at lógin hevur verið í gildi umleið eitt hálvt ár, vísir tað seg, at hon lutvíst hevur virkað eftir ætlan, men ávísir trupulleikar hava verið hjá útróðramonnum, tí verða hesar broytingar gjørdar í grein 3, stk. 3, punkt a) og grein 4, stk. 1.

## Álit

í

*løgtingsmáli nr. 111/1992: Broyting í løgtingslóg um minstuløn, dagstudning og minstaforvinning.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 31. august 1992 og eftir 1. viðgerð tann 29. september 1992 beint í fiskivinnunevndina

Nevndin hevur undir viðgerðini havt fund við Klaksvíkar Útróðrarfelag. Eisini hevur nevndin fingið bræv frá Føroya Fiskimannafelag um málið.

Umboðini fyri útróðrarfeløgini og Føroya Fiskimannafelag vístu á ávísar skeivleikar við lógini, sum var broytt í vár, serliga viðvíkjandi útgjaldingini av minstaforvinningi til útróðrarmenn.

Landssýrið sigur í viðmerkingunum til uppskotið m.a.: "Ætlanin við broytingini var at koma ovnýtsluni til lívs og ikki at revsa útróðrarmenn, sum lógin varð gjørd til. Eftir at lógin hevur verið í gildi umleið hálvt ár, vísir tað seg, at hon lutvíst hevur virkað eftir ætlan, men ávísir trupulleikar hava verið hjá útróðrarmonnum".

Í løgtingslóg nr. 32 frá 27. mars 1992 um minstuløn, dagstudning og minstaforvinning stendur í § 8, 2. stk. "Lønjavningargrunnurin setir í reglugerð tær gjøllaru reglurnar fyri minstulønini og hinum stuðlunum. Reglugerðin verður at senda landsstýrinum til góðkenningar". Fiskivinnunevndini er upplýst, at eingin reglugerð er gjørd, og er nevndin tí samd um at áleggja landsstýrinum at fáa reglugerð gjørda sum skjótast, har ásett verður m.a. manningartal, mest loyvdu frádráttir fyri loyvdar útreiðslur, so sum agn, egning, olja v.m.

Landsstýrið skjýtur upp at broyta § 3, nr. 3 punkt a. Nevndin er samd um at broytingin verður soleiðis, at persónur fær minstaforvinning, um inntøkan seinastu tríggjar mánaðirnar ikki er størri enn galdandi minstuløn, ið nú er kr. 12.725,00 um mánaðin.

Landsstýrið hevur eisini skotið upp at broyta § 5, stk. 1, men her er ikki samsvar í millum føroysku og donsku orðingina í uppskotinum.

Í galdandi lóg er ikki ásett, hvussu brot á lógina skulu revsast. Nevndin er samd um, at tað er neyðugt at hava reglur um lógarbrot við í lógini, og setir tí fram uppskot hesum viðvíkjandi.

Lógin um minstuløn, dagstudning og minstaforvinning kom í gildi tann 28. mars 1992.

Nevndin er samd um, at uppskotnu broytingarnar skulu fáa gildi frá sama degi, tó ikki greinin um brot á lógina, sum fær gildi dagin eftir kunngerð. Tó verður minstiforvinningur, sum er goldin sambært hesi lóg, ikki kravdur aftur.

Samsvarandi hesum setir ein samd fiskivinnunevnd í staðin fyri uppskot landsstýrisins fram nýtt:

**uppskot**

**til**

*broyting av løgtingslóg um minstuløn, dagstudning og minstaforvinning.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 32 frá 27. mars 1992 um minstuløn, dagstudning og minstaforvinning verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 3, nr. 3) litra 1 verður orðað soleiðis:
"At inntøkan hjá viðkomandi persóni seinastu tríggjar mánaðirnar ikki er størri enn galdandi minstaløn. Minstiforvinningur, sum er goldin sambært hesi lóg, verður ikki kravdur aftur."

2) § 5, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Minstiforvinningur til manningar á útróðrarførum er kr. 958,93

*ændring af lagtingslov om mindsteløn, dagstøtte og mindsteindtægt.*

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 32 af 27. marts 1992 om mindsteløn, dagstøtte og mindsteindtægt foretages følgende ændringer:

1) § 3, nr. 3), litra a affattes således:
"At indtægten hos vedkommende person de sidste tre månederne ikke er større end gældende mindsteløn. Mindsteindtægt, der er udbetalt i henhold til denne lov, kræves ikke tilbagebetalt".

2) § 5, stk. 1 affattes således:
"Mindsteindtægten til mandskabet på fartøjer, der driver hjemme-

fyri túrin, og til manningar á útróðrarførum, sum royna við snøri ella snellu, er minstiforvinningurin kr. 479,46 fyri dagin."

3) Sum nýggj § 9 verður sett:
"Í forskriftum, sum eru gjørdar við heimild í hesi lóg, kunnu gerast reglur um revsing við bót fyri brot á hesar forskriftir."

4) § 9 verður § 10.

§ 2.

Henda lóg fær gildi frá 28. mars 1992, tó fær § 9 gildi dagin eftir, at lógin er kunngjørd.

fiskeri udgør kr. 958,93 for fisketuren og til mandskab på fartøjer, som fisker med snøre eller snelle, er mindsteindtægten kr. 479,46 for dagen."

3) Som ny § 9 sættes:
"I forskrifter, som udstedes i medfør af denne lov, kan fastsættes straf i form af bøde for overtrædelse af disse forskrifter."

4) § 9 bliver § 10.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 28. marts 1992, dog træder § 9 i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

# 12. Broyting í løgtingslóg um landsjørð

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsjørð.*

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 59 frá 9. juni 1988 við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 14, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Jarðarráðið hevur burtur av landsjørð rætt til at leiga út traðir og traðarstykkir, stykkir til urtagarðsbrúk, grundstykkir til húsabygging, vinnu-, ítróttar- og frítíðarmál

*lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsjord.*

§ 1.

I lagtingslov nr. 59 af 9. juni 1988 med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1. § 14, stk. 1 affattes således:
"Landbrugsrådet er berettiget til at fraleje landsjord til trøer og trøstykker, lodder til havebrug, byggegrunde til husbyggeri, erhvervs-, idræts- og fritidsformål og offent-

og almenn endamál v.m. fyri eitt ávíst tíðarskeið."

2) § 16. stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Jarðarráðið hevur rætt til burtur av landsjørð at selja jørð til almenn endamál, grundstykkir til húsabygging, handils-, ídnaðar-, havbúnaðar-, ítróttar- og frítíðarendamál v.m."

lige formål m.v. for et bestemt tidsrum."

2) § 16, stk. 1 affattes således:
"Landbrugsrådet er berettiget til at frasælge landsjord til offentlige formål, byggegrunde til husbyggeri, handels-, industri-, havbrugs-, idræts- og fritidsformål m.v."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

**Viðmerkingar:**

Sambært løgtingslóg nr. 59 frá 9. juni 1988 um landsjørð, sum varð sett í gildi við kunngerð nr. 43 frá 11. mai 1989 við gildiskomu 1. juni 1989 hevur Jarðarráðið rætt til at leiga og selja landsjørð til ávís endamál.

Í samband við lógarsmíðið var ætlanin, at eingin avmarking skuldi vera í mun til lógina frá 1937, men sambært avgerð hjá Yvirlandbúnaðarstevnuni er rættarstøðan nú tann, at Jarðarráðið bert undir serligum umstøðum og til heilt nágreinilig endamál kann leiga og selja landsjørð. Hetta merkir m.a., at Jarðarráðið bert kann leiga út til hesi endamál:

1. Traðir og traðarstykkir,
2. stykkir til urtagarðsbrúk,
3. grundstykkir til húsabygging,
4. grundstykkir til ídnaðarendamál,

meðan alt annað fellur uttanfyri, og er harvið ikki loyvi at leiga til t.d.

- handilsendamál,
- havbúnaðarendamál,
- frítíðar- og ítróttarendamál,
- goymsluøkir hjá Telefonverkinum og sendistøðir,
- havna- og keiøkir,
- ruskpláss,
- tyrlupallar v.m.

Tað sigur seg sjálvt, at hetta fer ikki at bera til, og hevur verið vanligt, at økir hava kunnað verið leigað út til slík endamál undir gomlu lógini.

Tann rættarstøða, sum hevur tikið seg upp við seinastu avgerð hjá Yvirlandbúnaðarstevnuni 26. mars í ár merkir, at tað ikki er gjørligt at endurmýggja og av-

greiða m.a. leigusáttmálar til smoltstøðir og ítróttarøkið á Svangaskarði. Sostatt er bráðneyðugt at fáa hesi viðurskifti avgreidd beinanvegin og verður málið við hesum lagt fyri tingið til avgerðar.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 12/1992: Broyting í løgtingslóg um landsjørð.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 28. september 1992 og eftir 1. viðgerð 21. oktober 1992 beint í landbúnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og hevur undir viðgerðini havt fund við Føroya Jarðarráð og umboð fyri Bóndafelag Føroya.

Føroya Jarðarráð vísti á avgerð hjá Yvirlandbúðnaðarstevnuni um endurmýggjan av leigusáttmála til frítíðarfelag, har avgerðin gekk í móti Jarðarráðnum. Føroya Jarðarráð mælir til, at lógin verður orðað soleiðis, at tað greitt stendur í lógini, hvørji endamál Jarðarráðið hevur loyvi at leiga og selja landsjørð til.

Umboðini fyri Bóndafelag Føroya vístu á, at felagið verjir rættindini hjá festibøndrunum. Bóndafelagið sigur í skrivi, sent til nevndina eftir fundin: "Vit meta als ikki, at neyðugt er við lógarbroyting í hesum føri, bert tí tvey mál um útleigu av festijørð ikki blivu avgreidd, sum Føroya Jarðarráð ynskti tað. Vit vísa á øll leigumál um traðir, ítróttar- og frítíðarmál, sendistøðir, havna- og keiøkir, ruskpláss, tyrlupallar v.m., sum eru og verða gjørd í sátt og semju."

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Henrik Old, Mikkjal Sørensen, Birgir Danielsen og Terje Davidsen) vísir á, at landsstýrið í viðmerkingunum sigur, at: "tann rættarstøða, sum hevur tikið seg upp við seinastu avgerð hjá Yvirlandbúnaðarstevnuni 26. mars 1992, merkir, at tað ikki er gjørligt at endurmýggja og avgreiða m.a. leigusáttmálar til smoltstøðir og ítróttarøkið á Svangaskarði". Meirilutin mælir til at broyta lógina soleiðis, sum landsstýrið skjýtur upp og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Heini O. Heinesen) tekur støðu í tingsalinum.

# 13. Landsstýrismál

Hjálagt verða send løgtinginum 10 avrit (eintøk) av gerðabók landsstýrisins fyri tíðarskeiðið 1. august 1991 til 21. juli 1992.

# 14. Broytingar í revsilógini

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið samtykkir, at § 1 í lóg nr. 385 frá 10. juni 1987 um broyting í revsilógini og rættargangslógini (fíggjarlig brotsverk) verður sett í gildi fyri Føroyar.

**Viðmerkingar:**

Ríkisumboðið hevur spurt, um landsstýrið hevur nakað at viðmerkja til, at lóg nr. 385 frá 10. juni 1987 um broyting í revsilógini og rættargangslógini (fíggjarlig brotsverk) verður sett í gildi fyri Føroyar.

Sambært § 4 kann § 1 setast í gildi fyri Føroyar við kgl. fyriskipan, meðan § 2 um broytingar í rættargangslógini ikki kann setast í gildi við kgl. fyriskipan. Her er galdandi serstøk rættargangslóg fyri Føroyar.

Endamálið við lógarbroytingini er at herða stríðið móti fíggjarligum brotsverkum, t.d. misbrúki av felagslógini og konkurslógini og við villleiðandi ella skeivari bókførslu.

**Viðmerkingar til tær einstøku broytingarnar:**

**§ 1, nr. 1:** Í § 79 er broytingin tann, at í samband við dóm fyri brotsverk skal tað eisini vera gjørligt at frádøma persóninum rættin til at vera stovnari, stjóri ella nevndarlimur í einum partafelag ella øðrum felag fyri at forða fyri misbrúki av felagslóggávuni og konkurslóggávuni.

**§ 1, nr. 2:** Í § 131 verður revsingin fyri m.a. at geva seg út fyri at vera ein almennur myndugleiki herd upp til 6 mánaðar fongsul.

**§ 1, nr. 3:** Stk. 2 í § 131 er nýtt og sambært hesum stykki verður hann revsaður, sum medvirkar til, at ein persónur hevur eitt virksemi, sum hann hevur mist rættin til at útinna.

**§ 1, nr. 4:** Revsirammun í § 296, stk. 1 verður nú broytt úr 2 í 1 ár, tí mett hevur verið, at hon eigur at vera tann sama, sum fyri tey álvarsamastu brotini á bókhaldsskylduna.

**§ 1, nr. 5:** Nú verður gjørligt at revsa serstakliga álvarsom brot á bókhaldsskylduna við upp til 1 árs fongsul. Fyrr var revsirammun einans bót ella hefti.

Landfútin hevur havt málið til umrøðis og hevur mælt til, at lógin verður sett í gildi fyri Føroyar.

Landsstýrið mælir løgtinginum til at samtykkja, at lógarbroytingin kann setast í gildi fyri Føroyar.

## Álit

í

*løgtingsmáli nr. 14/1992: Broytingar í revsilógini.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 28. september 1992 og eftir 1. viðgerð 27. oktober 1992 beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og er samd um at mæla løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

# 15. Avtøka av forboði móti handli við Suðurafrika

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg um forboð móti handli við Suðurafrika.*

*lagtingslov om ophævelse af lagtingslov om forbud mod handel med Sydafrika og Namibia.*

**§ 1.**

Løgtingslóg nr. 12 frá 24. februar 1989 um forboð móti handli við Suðurafrika og Namibia fer úr gildi.

**§ 1.**

Lagtingslov nr. 12 af 24. februar 1989 om forbud mod handel med Sydafrika og Namibia ophæves.

**§ 2.**

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

**Viðmerkingar:**

Tá Danmark og onnur norðurlond settu forboð móti handli við Suðurafrika varð hetta eisini gjørt í Føroyum við løgtingslóg nr. 12 frá 24. februar 1989 um forboð móti handli við Suðurafrika og Namibia.

Lógin gav landsstýrinum heimild til við kunngerð at seta bannið úr gildi viðvíkjandi Namibia, og varð hetta gjørt við kunngerð nr. 26 frá 28. februar 1990.

Viðurskiftini í Suðurafrika eru nú batnað so nógv, at landsstýrið metir, at bannið eigur at verða sett úr gildi. Í Danmark varð bannið sett úr gildi tann 20. mars 1992.

Landsstýrið mælir løgtinginum til at avtaka forboðið móti handli við Suðurafrika.

# 16. Broytingar í ávísum lógum innan øki løgmálaráðsins

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið samtykkir, at setast kann í gildi fyri Føroyar § 6 í lóg nr. 386 frá 20. mai 1992 um broytingar í ávísum lógum innan øki løgmálaráðsins.

**Viðmerkingar:**

Ríkisumboðið hevur spurt, um heimastýrið ynskir settar í gildi fyri Føroyar broytingar í passlógini soleiðis, sum tað er ásett í § 6 í lóg nr. 386 frá 20. mai 1992 um broytingar í ávísum lógum innan øki løgmálaráðsins.

Tað hevur verið ávís ógreiða á heimildum løgmálaráðsins til uppkrevjan av gjøldum, eitt nú gjøldum fyri pass, ið higartil hava verið kravd sambært kunngerð. Løgmálaráðið hevur avgjørt at fáa gjøldini ásett við lóg.

Tey gjøldini, ið skotin eru upp í § 6, eru tey somu, ið higartil hava verið kravd sambært kunngerð.

Landsstýrið mælir løgtinginum til at samtykkja, at setast kann í gildi fyri Føroyar § 6 í lóg nr. 386 frá 20. mai 1992 um broytingar í ávísum lógum innan øki løgmálaráðsins.

Hjáløgd er lógin og lógaruppskot løgmálaráðsins við viðmerkingum.

**Álit**

**í**

*løgtingsmáli nr. 16/1992: Broytingar í ávísum lógum innan øki løgmálaráðsins.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 29. september 1992 og eftir 1. viðgerð 27. oktober 1992 beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Mikkjal Sørensen, Birgir Danielsen, Bjarni Djurholm og Finnbogi Arge) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja tað.

Ein minniluti (Signar Hansen) tekur støðu í tingsalinum.

# 17. Ígildissetan av broyting í lóg um danskan heimarætt

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið samtykkir, at lóg nr. 159 frá 18. mars 1991 um broyting í lóg um danskan heimarætt kann setast í gildi fyri Føroyar.

**Viðmerkingar:**

Ríkisumboðið hevur við skrivi dagfest 6. august 1992 spurt, um heimastýrið ynskir setta í gildi fyri Føroyar broyting í lógini um danskan heimarætt og kunngerð nr. 184 um brúkaragjald í samband við veiting av heimarætti.

Lógin hevur tvey høvuðsendamál, deils at gera umsitingina einfaldari, deils at geva heimild til at áseta gjald.

Við kunngerð nr. 184 frá 20. mars 1991 um brúkaragjald í samband við veitan av heimarætti er gjaldið ásett til 1.000 kr.

Hjáløgd er lóg nr. 159 frá 18. mars 1991 um broyting í lóg um danskan heimarætt, kunngerð nr. 184 frá 20. mars 1991 um brúkaragjald í samband við veitan av heimarætti, lógaruppskotið við viðmerkingum og lógarkunngerð nr. 457 frá 17. juni 1991 um danskan heimarætt.

Landsstýrið mælir løgtinginum til at samtykkja, at setast kann í gildi fyri Føroyar lóg nr. 159 frá 18. mars 1991 um broyting í lóg um danskan heimarætt.

**Álit**

**í**

*løgtingsmáli nr. 17/1992: Ígildissetan av broyting í lóg um danskan heimarætt.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 29. september 1992 og eftir 1. viðgerð 27. oktober 1992 beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Mikkjal Sørensen, Birgir Danielsen, Bjarni Djurholm og Finnbogi Arge) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja tað.

Ein minniluti (Signar Hansen) tekur støðu í tingsalinum.

# 18. Løgtingslóg um lántøku til landskassan

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um lántøku til landskassan.*

**§ 1.**

Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at læna 500 mió kr., harav 200 mió. kr. verða at nýta til fígging av rakstrinum og 300 mió. kr. at skjóta inn í ein grunn, at nýta til nýggjan eginpening í Sjóvinnubankanum.

**§ 2.**

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

*lagtingslov om lån til landskassen.*

**§ 1.**

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage lån på 500 mio. kr., deraf 200 mio. kr. bliver at anvende til financiering af driften og 300 mio. kr. at indskyde i en fond til brug for ny egenkapital i Sjóvinnubankin.

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsesdagen.

**Viðmerkingar:**

Sambært avtaluni millum ríkisstjórnina í Danmark og Føroya Landsstýri, so vil Tjóðbankin rediskontera landsstýrisvekslar upp á upp til 500 mió. kr. umframt tær 200 mió. kr., sum Tjóðbankin rediskonterar í løturi. Seinni kunnu tær 500 mió. kr. leggjast um til at vera lán úr danska statskassanum.

Ætlanin er at nýta 300 mió. kr. at seta í ein grunn til endurreisn av P/F Sjóvinnubankanum. Verður lógaruppskotið samtykt, hevur landsstýrið heimild til at seta 300 mió. kr. í henda grunn. Íleggingargrunnurin fyri Føroyar setir 200 mió. kr. í nýggja grunnin. Sambært § 5 í avtaluni millum ríkisstjórnina og landsstýrið, skal nýggi grunnurin so seta umleið 475 mió. kr. í Sjóvinnubankan.

Hinar 200 mió. kr. er ætlanin at læna til væntað hall á fíggjarlógini 1992 og til tiltaksgjaldføri landskassans.

Tá nýggj fíggjarætlan varð løgd í juni mánaði í ár, var væntaða hallið umleið 235 mió. kr., og heimild var fingin at fíggja hetta hall og harumframt eitt tiltaksgjaldføri upp á 65 mió. kr., t.v.s. lániheimildin var tilsamans 300 mió. kr.

Av tí at hallið í 1992 væntandi verður umleið 400 mió. kr., so er neyðugt við meirfígging upp á umleið 100 mió. kr. í ár. Harumframt er neyðugt at hava eitt ávíst tiltaksgjaldføri til 1993. Avsettar til hetta tiltaksgjaldføri eru 100 mió. kr.

Veksilskuldin fellur til gjaldingar 6 mánaðir eftir, at hon er upptikin. Lánið verður tá umskift við eitt lán frá Danska Ríkiskassanum, sum gongur yvir 5 ár. Hetta lán er treytað av, at landsstýrið uppfyllir treytirnar í grein 8 í áðurnevnda sáttmála millum ríkisstjórnina og landsstýrið.

Við framlagda lógaruppskoti søkir landsstýrið Løgtingið um heimild at taka 500 mió. kr. í láni. Við lántøkulógini frá 20.desember 1991 hevur landsstýrið altíð loyvi til endurfígging og umlegging av verandi lánum. Ætlanin við lógaruppskotinum er sostatt at veita landsstýrinum heimild at økja samlaðu skuld landskassans 500 mió. kr.

Hjálagdur er løgtinginum til kunningar sáttmálin millum Ríkisstjórn Danmarkar og Føroya Landsstýri. Viðmerkjast skal, at § 12 í sáttmálanum seinni er strikað.

**Álit**

**í**

*løgtingsmáli nr. 18/1992: Løgtingslóg um lántøku til landskassan.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 19. oktober 1992 og eftir 1. viðgerð 19. oktober 1992 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og havt fund við Jógvan Sundstein, landsstýrismann í fíggjarmálum. Landsstýrismaðurin kunnaði fíggjarnevndina um tey

skjøl, ið skulu leggjast til grund fyri víðari avgreiðslu av fyriliggjandi máli, og umrøddi serliga spumingarnar viðvíkjandi lánavtaluni millum 60 milliónagrunnin (Investeringsfonden for Færøeme) og komandi "Finansieringsfonden af 1992", uppskot til stovningarskjal viðvíkjandi nevnda grunni, notat um sama grunn frá Búskaparráðnum og skriv frá Ríkisumboðsmanninum viðvíkjandi fyriliggjandi máli sum heild.

Fíggjarnevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Vilhelm Johannesen, Anfinn Kallsberg, Birgir Danielsen, Finnbogi Arge og Lasse Klein) tekur undir við málinum og mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins. Lasse Klein vísir til niðanfyristandandi viðmerkingar sínar.

Lasse Klein ger vart við, at hann er misnøgdur við málsviðgerðina og at allar treytirnar í avtaluni millum donsku stjórnina og landsstýrið ikki blivu viðgjørdar undir einum.

Í samband við ta mannminkandi støðu og ikki minst ta skomm, sum føroyska samfelagið er komið í, í fyrsta lagi løgting og í øðrum lagi landsstýrið og í triðja lagi vinnan og í fjórða lagi føroyski peningaheimurin, sum ikki hava dugað at umsitið hetta samfelag, verða tung tøk at taka til tess at fáa búskapin upp á føtur.

Komandi bankalóg eigur í framtíðini at seta sera strong krøv - strangari enn onnur lond seta til sínar bankar - til eginpening, trygd og alment innlit og eftirlit. Bankar og peningastovnar eiga ikki at sleppa at spæla russiska roulett við landsins fíggjarviðurskiftum og fólksins vælferð.

Avoldaða partafelagslógin má, saman við øðrum ótíðarhóskandi vinnulógum, endurskoðast sum skjótast og neyðugar ábøtur gerast.

Nú er komið at evstu stund. Eingin orsøk er at sita og bíða eftir, hvørji tiltøk skulu fremjast. Vit hava øll vitað, hvønn veg tað bar og vit vita øll, hvat ið eigur at verða gjørt. Nú dugir eingin undanførsla longur.

Vit ásanna, at støðan í samfelagnum er álvarsom, og tí hava vit ongan annan møguleika sum er, enn at taka undir við fyriliggjandi uppskoti, men løgtingið eigur í framtíðini at taka aftur allar aðrar heimildir, ið latnar eru landsstýrinum til lántøku og veðhaldsbindingar. Við fólkaatkvøðu átti Føroya fólk at avmarka løgtingsins heimildir til lántøku, so at sleppast kann undan skuldarbindingum av komandi ættarliðum. Kommunur og almennir stovnar skulu ongar heimildir hava at læna seg út á sjógv.

# 19. Løgtingslóg um brenni- og samskiftisstudning til ávísar pensjónistar v.fl.

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um brenni- og samskiftisstudning til ávísar pensjónistar v. fl.*

*lagtingslov om brændsels- og kommunikationstilskud til visse pensionister m. fl.*

**§ 1.**

Í fíggjarárinum 1992 verður úr landskassanum veittur ein brenni- og samskiftisstudningur til pensjónistar við 1.928 kr. til hvønn pensjónist.

**§ 1.**

I 1992 ydes af landskassen et brændsels- og kommunikationstilskud til pensionister på 1.928 kr. til hver pensionist.

**§ 2.**

Brenni- og samskiftisstudningurin verður latin fólki, ið áðrenn 1. oktober 1992 hava fingið játtaða fólkapensjón, avlamispensjón ella einkjupensjón ella hava sent inn umsókn um slíka pensjón, tí rætturin til hana er vunnin, og seinni fáa pensjónina játtaða.

**§ 2.**

Brændsels- og kommunikationstilskud ydes til personer, som inden den 1. oktober 1992 har fået bevilget folkepension, invalidepension eller enkepension eller har indsendt ansøgning om sådan pension, fordi retten til denne er opnået, og senere får pensionen bevilget.

**§ 3.**

Treytin fyri at fáa brenni- og samskiftisstudning er, at pensjónisturin ikki hevur hægri ársinntøku út um pensjónina enn 80.000 kr. fyri hjún og 60.000 kr. fyri støk. Til grund fyri útrokningini verður løgd inntøkan, sum nýtt verður í sambandi við útrokning av pensjónini

**§ 3.**

Betingelsen for at få brændsels- og kommunikationstilskud er, at pensionisten ikke har højere årsindtægt udover pensionen end 80.000 kr. for ægtepar og 60.000 kr. for enlige. Til grund for beregningen lægges den indtægt, der anvendes i forbindelse med beregning af

pr. 1. oktober 1992. Hjúnafelagar, sum bæði eru pensjónistar, eiga ein part í felag.

§ 4.

Í fíggjarárinum 1992 verða úr landskassanum eisini veittar fólki, sum tann 1. oktober 1992 fáa hjálp sambært § 13 í forsorgarlógini, 1.928 kr. í brenni- og samskiftisstudningi undir somu treytum, sum fyrisett í § 3 í hesi lóg.

§ 5.

Føroya Gjaldstova rindar brenni- og samskiftisstudningin.

**Stk. 2.** Annars fyrisitur Almannastovan brenni- og samskiftisstudningin.

**Stk. 3.** Avgerðir, sum Almannastovan hevur tikið, kunnu innan 4 vikur skjótast inn fyri landsstýrið.

§ 6.

Brenni- og samskiftisstudningurin er ikki skattskyldugur.

§ 7.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

pensionen pr. 1. oktober 1992. Ægtepar, som begge er pensionister, får tilsammen en andel.

§ 4.

I finansåret 1992 ydes af landskassen også et brændsels- og kommunikationstilskud på 1.928 kr. til personer, der den 1. oktober 1992 modtager hjælp efter forsorgslovens § 13 på samme betingelser, som fastsat i § 3 i denne lov.

§ 5.

Brændsels- og kommunikationstilskuddet udbetales af Føroya Gjaldstova.

**Stk. 2.** I øvrigt varetager Almannastovan administrationen af brændsels- og kommunikationstilskuddet.

**Stk. 3.** Afgørelser, som Almannastovan har truffet, kan inden for 4 uger indbringes for landsstyret.

§ 6.

Brændsels- og kommunikationstilskuddet er ikke skattepligtigt.

§ 7.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

**Viðmerkingar:**

Síðani 1980/81 hevur verið goldin pensjónistum v.fl. brennistudningur sambært løgtingslóg, ið einans hevur havt gildi fyri viðkomandi fíggjarár. Síðani 1988 hevur saman við brennistudninginum eisini verið latin ein stuðul til lutvísa rindan av samskiftisútreiðslum, so sum fast telefongjald, sjónvarpsgjald og útvarpsgjald.

Til 1990 var brenni- og samskiftisstudningurin 2.200 kr., og var játtanin á fíggjarlógini lagað eftir, at pensjónistar, ið uppfyltu treytirnar í § 3 í lógini, fingu hesa upphædd. Í fíggjarlógini 1989 var játtanin 7.360.000 kr. Síðani 1990 hevur játt-

anin á fíggjarlógini verið 6.500.000 kr. Upphæddin til hvønn pensjónist er tí seinastu árini lutfalsliga lækkað samsvarandi lækkaðu játtanini. Í 1990 og 1991 var brenni- og samskiftisstudningurin 1.943 kr.

Sambært upplýsingum frá Almannastovuni er talið av pensjónistum mett at vera 3.370, og brenni- og samskiftisstudningurin fyri 1992 er tí ásettur til 1.928 kr.

Landsstýrið hevur ætlað at broytt skipanina viðvíkjandi brenni- og samskiftisstudninginum í 1992 soleiðis, at sleppast kundi undan nøkrum óætlaðum avleiðingum, ið standast av, at brenni- og samskiftisstudningurin er tengdur at tí einstaka pensjónistinum í staðin fyri at einum húsarhaldi.

Tann 9. oktober 1992 varð fundur hildin, har landsstýrið, Almannastovan, Føroya Kommunufelag og Tórshavnar Býráð luttóku. Niðurstøðan á fundinum var, at brenni- og samskiftisstudningurin í 1992 átti at verða rindaður eftir verandi skipan, men at tað beinan vegin verður farið undir at fyrireika eina annarleiðis skipan fyri 1993, sum fer at hava við sær, at kommunurnar við sínum staðkunnleika vera við í umsitingini av lógini.

Frá 1993 væntar landsstýrið tí, at skipanin verður broytt soleiðis, at Almannastovan rindar studningin eftir einum lista, sum kommunurnar hava gjørt yvir húsarhald í kommununi.

# 20. Broyting í løgtingslóg um sjómenn

**Uppskot**

til

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjómenn.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 4 frá 15. januar 1988 um sjómenn verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 2, stk. 4 verður "§ 68 í sjólógini" broytt til: "§ 70 í sjólógini".
2) Í § 29 verður stk. 5 strikað.

*lagtingslov om ændring i lagtingslov om sømænd.*

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 4 af 15. januar 1988 om sømænd foretages følgende ændringer:

1) I § 2, stk. 4 ændres "§ 68 i søloven" til: "§ 70 i søloven".
2) I § 29 ophæves stk. 5.

| | |
|---|---|
| 3) Í § 43, stk. 1 verður "uppsagdur" broytt til: "avkoyrdur". | 3) (ændring i den færøske tekst). |
| 4) Í § 47, litra 3 verður "§ 39" broytt til: "§ 38". | 4) I § 47, litra 3 ændres "§39" til: "§ 38". |
| 5) Í § 69, stk. 3 verður "§ 68, stk. 2" broytt til: "§ 66, stk. 2". | 5) I § 69, stk. 3 ændres "§ 68, stk. 2" til: "§ 66, stk. 2". |
| **§ 2.** | **§ 2.** |
| Føroya Landsstýri ásetir, nær henda lóg fær gildi. | Landsstyret fastsætter tidspunktet for lovens ikrafttræden. |

**Viðmerkingar:**

Løgtingslóg nr. 4 frá 15. januar 1988 um sjómenn er lýst, men ongantíð sett í gildi. Orsøkirnar eru fleiri. Lógin krevur reglur ásettar í kunngerð um matstovufólk á ferðamannaskipum, um læknakanningar av sjómonnum, um skipstænastuna og ábyrgdarøki hjá yvirmonnum, um verju móti ávísum sjúkum og heilsuskaðum, um kost og heilsuviðurskifti umborð, um mistar ognarlutir, um avfaring og heimferðarreglur, um sjúkrarøkt, um siglingarbøkur, mynstringarbrøv og manningartalvur. Harumframt krevur lógin umsitingarligar reglur um avfaringarrætt og fría heimferð við barnsburð, trygdarumboð á skipi, verju móti malaria, almenna sjúkratrygging og dagpeningareglur við sjúku og barnsburð. Lógin krevur umsiting av reglunum í lógini um starvsavtalur og hýrformálar, um útreiðslur, sum reiðarí og landsstýrið hava skyldu at rinda, alt eftir, um tað snýr seg um heimferðarkostnað ella endurrindan av útreiðslum vegna sjúku ella við sjómansins deyð o.s.fr. Sjóvinnufyrisitingin er kærustaður við uppgerð skiparans og í samband við læknakanningar.

Landsstýrið hevur longu sett nakrar kunngerðir í gildi við heimild í gomlu lógini, sum enn er í gildi, men tað er serliga spurningurin um § 29, stk. 5 í lógini, har reiðara á fiskiskipi er álagt at tryggja sjómann móti inntøkumissi í tí føri, at hann óarbeiðsførur fer í land av túri, orsakað av sjúku ella skaða, sum hevur gjørt, at málið hevur drigið út við at fáa gildissett lógina. Vanlukkutryggingin hevur arbeitt við spurninginum um inntøkutryggingina eftir § 29, stk. 5 og er komin til eina skipan, sum hevur verið løgd fyri Reiðarafelagið og sjómannafeløgini. Skipanin verður sera dýr og fer at kosta reiðaríunum um 12 mió. kr. Undir seinastu sáttmálasamráðingunum millum Reiðarafelagið og Fiskimannafelagið og hini sjómannafeløgini var tryggingarspurningurin ein av høvuðsspurningunum, men eftir at partarnir vóru samdir um at bíða við hesum, samstundis sum landsstýrið játtaði ikki at seta § 29, stk. 5 í gildi, fekst ein loysn á hesum máli. Landsstýrið hevði í skrivi til øll feløgini hin 30. desember 1991 spurt, um

feløgini kunnu góðtaka, at lógin verður sett í gildi við tí tryggingaravtalu, sum Vanlukkutryggingin er komin til. Feløgini hava skrivliga til landsstýrið sagt frá, at tey ikki ynskja hesa tryggingaravtalu.

Út frá hesum verður lagt fyri løgtingið uppskot um at strika stk. 5 í § 29.

**Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:**

**ad § 1**

1) Rætting til løgtingslógina sambært sjólógini jbr. lógarkunngerð frá ídnaðarmálaráðnum nr. 141 frá 1. apríl 1985.
2) Víst verður til frágreiðing í málinum um at tryggja sjómann móti inntøkumissi í tí føri, at hann óarbeiðsførur fer í land á túri, orsakað av sjúku ella skaða upp til 3 mánaðir.
3) Rætting í orðingini smb. pkt. 3).
4) Rætting til verandi lógartekst.
5) Rætting til verandi lógartekst.

## Álit

í

*løgtingsmáli nr. 20/1992: Broyting í løgtingslóg um sjómenn.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 27. oktober 1992 og eftir 1. viðgerð 30. oktober 1992 beint í ídnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og mælir ein samd nevnd tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

# 21. Søla av fastogn landsstýrisins í Tórshavn

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um sølu av parti av fastogn landsstýrisins í Tórshavn.*

**§ 1.**

Landsstýrinum verður heimilað at selja sethúsini matr. nr. 920 c, Landavegi 35, Tórshavn.

**§ 2.**

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

*lagtingslov om salg af del af landsstyrets faste ejendom i Tórshavn.*

**§ 1.**

Landsstyret bemyndiges til at sælge beboelseshus matr. nr. 920 C, Landavegur 35, Tórshavn.

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

**Viðmerkingar:**

Landsstýrið legði í seinastu tingsetu fram løgtingsmál nr. 70/1991 um sølu av sethúsunum á matr. nr. 920c, Landavegur 35, Tórshavn.

Málið fall við 14-0 atkvøðum og hevur landsstýrið fingið uppspurt orsøkina til tess at vera, at Fróðskaparsetrið hevði áhuga fyri húsunum til undirvísing o.a.

Aftaná at Søguvísindadeildin, Náttúruvísindadeildin og Skjalasavnið hava sæð húsini og ikki funnið tey nýtilig til síni endamál, hevur Fróðskaparsetrið boðað frá, at áhugi ikki er fyri teimum.

Tá hugsað verður um útreiðslurnar, so sum ábøtur, trygging o.a., ið standast av slíkari fastari ogn, ið landið ikki hevur brúk fyri at eiga, metir landsstýrið skilabestu loysnina vera at selja húsini til hægstbjóðandi, og verður málið tí við hesum lagt aftur fyri løgtingið.

**Álit**

**í**

*løgtingsmáli nr. 21/1992: Søla av fastogn landsstýrisins í Tórshavn.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 27. oktober 1992 og eftir 1. viðgerð tann 30. oktober 1992 beint í fíggjarnevndina til viðgerðar.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Anfinn Kallsberg, Birgir Danielsen, Flemming Mikkelsen og Asbjørn Joensen) er samdur við landsstýrinum í, at tað hevur onga meining at eiga hús, ið ikki kunnu nýtast hjá umsitingini ella nøkrum almennum stovni. Meirilutin kann tí taka undir við, at matr. nr. 920c, Landavegur 35, Tórshavn verður selt til hægstbjóðandi, og mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Finnbogi Ísakson) setir eingi uppskot fram.

# 22. Løgtingslóg um uppboðssølu av fiski

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um uppboðssølu av fiski.*

**§ 1.**

Bert persónar, góðkendir av landsstýrinum, kunnu halda sjálvbodna, almenna uppboðssølu av fiski.

**Stk. 2.** Um uppboðssøluhaldarin ikki heldur § 3, stk. 3 ella reglur, gjørdar við heimild í hesi lóg, kann landsstýrið taka góðkenningina aftur.

**§ 2.**

Heimilað verður landsstýrinum at leggja út úr landskassanum upp til 3 mió.

*lagtingslov om auktion for fisk.*

**§ 1.**

Frivillig, offentlig auktion må kun afholdes af personer, som landsstyret har godkendt.

**Stk. 2.** Såfremt auktionsholderen ikke overholder § 3, stk. 3 eller forskrifter med hjemmel i denne lov, kan landsstyret inddrage godkendelsen.

**§ 2.**

Landsstyret bemyndiges til at betale ud af landskassens midler op til 3 mill. kr.

kr. til stovnan av gólvuppboðssølu av fiski.

**Stk. 2.** Stuðulin sambært stk. 1 kann veitast sum stuðulslán, tó í mesta lagi kr. 1,5 mió kr. fyri hvørja gólvuppboðssølu.

**Stk. 3.** Stuðulslánið er avdráttarfrítt 3 tey fyrstu árini og verður síðani at afturgjalda yvir 5 ár. Rentan er 8% p.a.

til oprettelse af gulvauktion for fisk.

**Stk. 2.** Støtten i henhold til stk. 1 kan ydes som støttelån, dog højst 1,5 mill. kr. til hver gulvauktion.

**Stk. 3.** Støttelånet er afdragsfrit de første 3 år og skal derefter tilbagebetales over 5 år. Renten er 8% p.a.

**§ 3.**

Heilsufrøðiliga Starvsstovan skal góðkenna gólvuppboðssøluhølið og innrætting tess.

**Stk. 2.** Í uppboðssølu kunnu øll fiskasløg seljast.

**Stk. 3.** Bert tey, sum eru búsett í Føroyum, ella feløg, skrásett í Føroyum, kunnu bjóða á uppboðssølunum.

**§ 3.**

Gulvauktionshallen og indretningen skal godkendes af Heilsufrøðiliga Starvsstovan.

**Stk. 2.** Alle fiskearter kan sælges på auktion.

**Stk. 3.** Kun personer, der er bosiddende på Færøerne, eller selskaber, registreret på Færøerne, kan afgive bud på auktionerne.

**§ 4.**

Landsstýrið kann skipa fyri uppboðssølu gjøgnum telefon millum fiskifar og keypara.

**Stk. 2.** Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna hevur hesa uppboðssølu um hendi.

**Stk. 3.** Landsstýrið kann í kunngerð áseta gjald fyri hesa uppboðssølu.

**§ 4.**

Landsstyret bemyndiges til at organisere auktionssalg pr. telefon mellem fiskeskib og køber.

**Stk. 2.** Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna administrerer ordningen.

**Stk. 3.** Landsstyret kan med bekendtgørelse fastsætte gebyr for denne auktion.

**§ 5.**

Landsstýrið kann í kunngerð áseta gjøllari forskriftir til fremjingar av hesi lóg.

**§ 5.**

Landsstyret kan i bekendtgørelse fastsætte nærmere forskrifter for lovens gennemførelse.

**§ 6.**

Uttan so, at strangari revsing er uppiborin eftir aðrari lóggávu, verður við

**§ 6.**

Med mindre strengere straf er forskyldt efter anden lovgivning, straffes med

bót revsaður tann, ið ger brot á § 1 og § 3, stk. 1. Í forskriftum við heimild í hesi lóg kunnu ásetast reglur um revsing við bót fyri brot á forskriftimar.

bøde den, der overtræder § 1 og § 3, stk. 1. I forskrifter med hjemmel i denne lov kan fastsættes regler om bødestraf for overtrædelse af forskrifterne.

§ 7.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 106 frá 3. august 1990 um royndaruppboðssølu av fiski. Kunngerð nr. 110 frá 13. mai 1992 um reglur fyri telefonuppboðssølu verður framhaldandi í gildi, til landsstýrið tekur avgerð um annað.

§ 7.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelse. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 106 af 3. august 1990 om forsøgsauktion for fisk. Bekendtgørelse nr. 110 af 13. maj 1992 om regler for telefonauktion forbliver i kraft, til landsstyret træffer anden afgørelse.

**Viðmerkingar.**

Løgtingslógin um royndaruppboðssølu av fiski, nr. 106 frá 3. august 1990, heimilar landsstýrinum at leggja út úr landskassanum upp til 3 mió. kr. til at stovna og reka royndaruppboðssølu av fiski. Hesa royndaruppboðssølu skal landsstýrið standa fyri.

Í Føroyum hevur leingi verið tosað um, at her eigur at vera sett á stovn gólvuppboðssøla av fiski. Sum sølumynstrið er hjá okkum, verða bert heilar lastir seldar. Við eini gólvuppboðssølu átti at fingist meir burtur úr fleiri fiskasløgum, sum ofta í dag heldur eru til hindurs enn annað. Landsstýrið er tí samt um, at tað ikki skal stovna og reka hesar gólvuppboðssølur. Í staðin ynskir landsstýrið at stuðla monnum, ið hava ætlanir um at fara undir hetta. Lagt verður fyri løgtingið uppskot til løgtingslóg, ið heimilar landsstýrinum at veita stuðul til ætlanir at seta á stovn gólvuppboðssølur av fiski. Stuðulin kann veitast sum stuðulslán. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg um royndaruppboðssølu av fiski, men kunngerðir við heimild í hesi lóg vera verðandi í gildi.

Bert persónar, sum danska løgmálaráðið hevur góðkent samb. "Anordning nr. 224 af 5. oktober 1936 om offentlig auktion ved auktionsledere" kunnu í høvuðsheitum halda sjálvbodna, almenna uppboðssølu.

Tað er ivasamt, um hesar reglur eru galdandi fyri uppboðssølu av fiski. Tað verður tó hildið óheppið, at danska løgmálaráðið skal góðkenna uppboðssøluhaldarar innan fiskivinnuøkið, sum annars er yvirtikið, og verður tí skotið upp, at góðkenningin verður givin av landsstýrinum.

# Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 22/1992: Løgtingslóg um uppboðssølur av fiski.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 27. oktober 1992 og eftir 1. viðgerð 30. oktober 1992 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tríggjar minnilutar.

Meirilutin (Henrik Old, Anfinn Kallsberg, Olaf Olsen og Jógvan Ingvard Olsen) tekur sum heild undir við málinum. Eftir uppskotinum frá landsstýrinum kunnu øll fiskasløg seljast á uppboðssølu, men meirilutin mælir til, at eisini fiskaúrdráttir (t.d. rogn og livur) og skeljafiskur skulu kunnu seljast á uppboðssølu og mælir tí til at broyta § 3, stk. 2 samsvarandi hesum.

Eftir uppskotinum kann landsstýrið í kunngerð áseta neyvari forskriftir til fremjingar av lógini. Meirilutin mælir til, at hesar kunngerðir verða lagdar fyri fiskivinnunevndina til góðkenningar, og setir samsvarandi hesum fram broytingaruppskot.

Við hesum broytingum mælir meirilutin løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins og setir samsvarandi hesum fram soljóðandi:

### broytingaruppskot

### til

### uppskot landsstýrisins

| | |
|---|---|
| 1) § 3, stk. 2 verður soljóðandi:<br>"Á uppboðssølu kunnu øll fiskasløg, fiskaúrdráttir og onnur sjódýr seljast." | 1) § 3, stk. 2 affattes således:<br>"Alle fiskearter, fiskerivarer og andre marine dyrearter kan sælges på auktion." |
| 2) § 5 verður soljóðandi:<br>"Landsstýrið kann saman við Fiskivinnunevnd Løgtingsins í kunngerð áseta gjøllari forskriftir til fremjingar av hesi lóg." | 2) § 5 affattes således:<br>"Landsstyret kan sammen med Lagtingets Fiskeriudvalg i bekendtgørelse fastsætte nærmere forskrifter for lovens gennemførelse." |

Minnilutin (Jógvan A. Johannessen) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Terje Davidsen) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Heini O. Heinesen) tekur undir við, at gólvuppboðssøla verður sett á stovn. Hetta var eisini politikkurin hjá undanfarnu samgongu, sum Tjóðveldisflokkurin var partur av. Hetta er eisini í samsvar við góðan tjóðveldispolitikk, at fáa avtikið tað, sum vit hava loyvt okkum at kalla privatkommunismuna.

Tað hevur verið og er neyðugt, at vit aftur í Føroyum fara at síggja veruleikan í eyguni. Men hetta uppskotið gongur ikki á tað borðið, tá almennur peningur skal brúkast til eina privata uppboðssølu. Tað, at privatir menn seta eina uppboðssølu á stovn kunnu vit bert fegnast um.

Upprunaliga skuldi ein almenn uppboðssøla liggja norðuri í Klaksvík í fyrsta umfari. Henda almenna uppboðssøla skuldi kostað 3 mió. krónur, tá var alt tikið við. Hetta var tað, sum semja var um í undanfarnu samgongu, har Tjóðveldisflokkurin var ein partur.

Nú eru tað privatir, sum eru farnir undir at seta hesa uppboðssølu á stovn. Her skjýtur landsstýrið upp, at sama upphæddin verður tikin úr landskassanum til í mesta lagi tvær privatar uppboðssølur, 1,5 mió. kr. í part. So kann tað verða ein spurningur, um tað er grundarlag fyri tveimum uppboðssølum í Føroyum.

Út frá hesum viðmerkingum kann minnilutin (Heini O. Heinesen) ikki taka undir við at játta almennan pening til at kappast í millum tey lokalu økini í Føroyum.

# 23. Avmarking av løn í samband við sjúku

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um avmarking av løn í samband við sjúku.*

**§ 1.**

Løntakarar, sum hava rætt til løn undir sjúku frá arbeiðsgevaranum, missa rættin til løn 2 teir fyrstu sjúkradagarnar.

**Stk. 2.** Fær arbeiðstakari kost og innivist sum ein part av lønini, verður hesin rættur varðveittur hóast ásetingina í stk. 1.

*lagtingslov om begrænsning af løn under sygdom.*

**§ 1.**

For lønmodtagere, der har ret til fra arbejdsgiveren at få løn under sygdom bortfalder retten til løn for de 2 første sygedage.

**Stk. 2.** Yder arbejdsgiveren lønmodtager kost og logi, som en del af lønnen, bevares retten hertil uanset bestemmelsen i stk. 1.

Stk. 3. Ásetanin í stk. 1 fevnir ikki um persónar, sum fáa skaða, sum vanlukkutryggingarlógin umfatar.

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Stk. 3. Personer, der pådrager sig arbejdsskade, omfattet af ulykkesforsikringsloven, er undtaget fra bestemmelsen i stk. 1.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

**Viðmerkingar:**

Orsøkin til, at landsstýrið leggur hetta uppskot fyri tingið, er ein liður í royndum landsstýrisins at minka um lønarútreiðslurnar hjá tí almenna.

Tað er ikki í løtuni møguleiki fyri at siga nágreiniliga, hvussu nógv verður spart av hesi orsøk, men roknar landsstýrið við at spara uml. 5 mió. kr. árliga á henda hátt.

**Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:**

**Ad § 1, stk. 1:** Henda ásetan hevur við sær, at løntakarar, sum annars høvdu fingið løn í samband við sjúku, missa henda rætt fyri tveir teir fyrstu sjúkradagarnar.

Ásetingin er at skilja soleiðis, at løntakari bert kann trekkjast fyri 16 tímar í einum sjúkutíðarskeiði. Hetta merkir, at roknast skal við veruligu fráveruni í tíðarskeiðinum, so eitt fulltíðarsett fólk, sum er sjúkt ein hálvan dag, verður trekt fyri ein hálvan dag og eitt fulltíðarsett fólk, sum fer heim sjúkt aftan á døgurða fyrsta dagin og er sjúkt næstu tveir dagarnar, verður trekt í løn fyri 16 tímar.

Løn er umframt grundløn eisiini allar viðbøtur sum løntakarin fær, t.d. kvøld- og náttarviðbót, reiðiviðbót o.s.fr. Pensjónsgjald verður eisini roknað við í lønina.

**Ad § 1, stk. 2:** Landsstýrið heldur, at hetta náttúrliga hoyrir við í summum førum, og tí er hetta undantikið stk. 1.

**Ad § 1, stk. 3:** Landsstýrið heldur tað ikki vera rímiligt, at persónar, sum eru undir vanlukkutryggingarlógini, verða umfataðir av hesi lóg.

**Álit**

**í**

*løgtingsmáli nr. 23/1992: Avmarking av løn í samband við sjúku.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 30. oktober 1992 og eftir 1. vigðerð 4. november 1992 beint í fíggjarnevndina.

Í viðmerkingunum sigur landsstýrið, at fyriliggjandi uppskot er ein liður í royndum landsstýrisins at minka um lønarútreiðslurnar hjá tí almenna.

Sparingin orsakað av, at løntakarar missa rættin til løn teir báðar fyrstu sjúkradagarnar, er mett at verða um 5 mió. kr. árliga.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Dan Petersen, Anfinn Kallsberg, Birgir Danielsen og Ashjørn Joensen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein minniluti (Finnbogi Ísakson) tekur ikki undir við málinum.

Ein annar minniluti (Finnbogi Arge) tekur støðu í tingsalinum.

# 24. Broyting í løgtingslóg um frítíð við løn v.m.

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um frítíð við løn v..m.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 30 frá 7. apríl 1986 um frítíð við løn verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 5, stk. 1 verður "26 dagar" broytt til: "24 dagar".
2) Í § 6 verður "26 dagar" broytt til: "24 dagar".
3) § 8, stk. 3 verður orðað soleiðis:

*lagtingslov om ændring i lagtingslov om ferie med løn m.v.*

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 30 af 7. april 1986 om ferie med løn foretages følgende ændringer:

1) I § 5, stk. 1 ændres "26 dage" til: "24 dage".
2) I § 6 ændres "26 dage" til: "24 dage".
3) § 8, stk. 3 affattes således:

"**Stk. 3.** Fyri fólk, sum starvast á skipi ella í flogfari, kann frítíðin, tá viðurskiftini gera tað neyðugt, tó verða givin aðra tíð á árinum. Frítíðin skal falla, so skjótt skips- ella flogfarsstarvið loyvir tí og taka við frá tí degi, báðir partar semjast um."

**4)** Í § 10, stk. 1 verður "10,25%" broytt til: "9,5%".

**5)** § 11, stk. 1, 2. pkt. verður strikað.

**6)** Í kapitli 8 verður yvirskriftin og § 23 strikað.

§ 2.

Ásetingar í sáttmálum í arbeiðsviðurskiftum um hægri frítíðarlønarprosent enn tað, sum er ásett í løgtingslóg nr. 30 frá 7. apríl 1986 um frítíð við løn, verða lækkaðar til tað frítíðarlønarprosentið, sum ásett er í lógini.

**Stk. 2.** Reglur í arbeiðsviðurskiftum um frítíðariskoyti sambært sáttmála, siðvenju, gerðardómi og líknandi fara úr gildi.

**Stk. 3.** § 6 í løgtingslóg nr. 37 frá 5. august 1971 um tænastumannalønir v.m. og flokking av tænastumannastørvum við seinni broytingum verður strikað.

§ 3.

Henda lóg fær gildi frá 1. november 1992. Tó fær § 1, nr. 3 ikki gildi fyrr enn 2. mai 1993.

"**Stk. 3.** For personer, der er ansatte på skibe eller luftfartøj, kan ferien, hvor forholdene gør det påkrævet, dog henlægges til andre tidsrum af året. Ferien skal gives, så snart hensynet til skibstjenesten eller tjenesten i luftfartøjet tillader det, og da fra det tidspunkt, hvorom gensidig aftale træffes."

**4)** I § 10, stk. 1 ændres "10,25%" til: "9,5%".

**5)** § 11, stk. 1, 2. pkt. ophæves.

**6)** I kapitel 8 ophæves overskriften og § 23.

§ 2.

Bestemmelser i overenskomster i arbejdsforhold om en højere feriegodtgørelsesprocent end den, som er fastsat i lagtingslov nr. 30 af 7. april 1986 om ferie med løn, nedsættes til den feriegodtgørelsesprocent, som er fastsat i loven.

**Stk. 2.** Regler i arbejdsforhold om ferietillæg i henhold til overenskomst, sædvane, voldgiftsdom eller lignende ophæves.

**Stk. 3.** § 6 i lagtingslov nr. 37 af 5. august 1971 om tjenestemandslønninger og klassificering af tjenestemandsstillinger med senere ændringer ophæves.

§ 3.

Denne lov træder i kraft fra 1. november 1992, § 1, nr. 3 dog først 2. maj 1993.

**Viðmerkingar:**

Sum ein liður í royndum landsstýrisins at minka um lønarútreiðslurnar hjá tí almenna skjýtur landsstýrið upp at broyta lógina um frítíð við løn soleiðis, at frítíðin minkar úr 30 døgum niður í 24 dagar, frítíðarlønarprosentið minkar úr 12% niður í 9,5% og at frítíðarískoytið hjá mánaðarløntum verður strikað.

Mett verður, at lønarútreiðslur landskassans í samband við, at frítíðarískoytið verður strikað, í 1993 fara at minka 8,2 mió. kr. og í 1994 19,6 mió. kr.

Við at lækka frítíðina 6 dagar sparir landskassin harumframt nógvar lønarútreiðslur til frítíðaravloysarar.

Broytingarnar, sum skotnar verða upp, fevna sjálvsagt um allan arbeiðsmarknaðin.

Tá løgtingið á vári 1986 samtykti lógina um frítíð við løn, var einki føroyskt ferðafólkarutuflogfar. 28. mars 1988 fór føroyska flogfelagið Atlantic Airways undir regluliga ferðafólkaflúgving millum Føroyar og Danmark. Galdandi regla í § 8, stk. 3 í lógini um frítíð við løn ber í sær serligar reglur fyri fólk, sum starvast á skipi. Eftir hesi reglu kann frítíðin, tá viðurskiftini gera tað neyðugt, verða givin aðra tíð á árinum. Frítíðin skal falla so skjótt skipsstarvið loyvir tí og taka við á tí degi, sum báðir partar semjast um.

Tá flutningur á sjógvi og í luftini eru vinnur, sum á mangan hátt kunnu samanberast og haraftrat í ávísan mun kappast hvør við aðra, heldur landsstýrið tað vera rætt og rímiligt at dagføra lógina um frítíð við løn soleiðis, at somu reglur fáa gildi fyri starvandi í flogfari sum umborð á skipi. Tí mælir landsstýrið løgtinginum til at samtykkja, at § 8, stk. 3 eisini fær gildi fyri starvandi í flogfari.

**Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:**

**Ad § 1, pkt. 1 og 2:** Tá lógin um frítíð við løn kom í gildi í 1986 var frítíðin sambært § 5, stk. 1 og § 6 sett til 26 dagar. Sambært § 23 varð hetta dagatal bækkað stigvíst yvir eitt ávíst áramál upp í 30 dagar. Sambært uppskotinum fer dagatalið úr 30 niður í 24 dagar. Frítíð, sum vunnin er áðrenn 1. november 1992, verður tó varðveitt.

**Ad § 1, pkt. 3:** Her verður skotið upp, at fólk, sum starvast í flogfari koma undir somu reglur, sum fólk, ið starvast umborð á skipi.

**Ad § 1, pkt.4:** Tá lógin um frítíð við løn kom í gildi í 1986, varð frítíðarlønin sambært § 10, stk. 1 sett til 10,25% av vunnari løn. Sambært § 23 varð framman-fyri nevnda frítíðarlønarprosent hækkað stigvíst yvir eitt ávíst áramál upp í 12%.

Sambært uppskotinum fer frítíðarlønarprosentið niður úr 12 í 9,5%. Frítíðarløn, sum er vunnin áðrenn 1. november 1992 verður tó varðveitt.

**Ad § 1, pkt. 5:** Sambært § 11, stk. 1, 2. pkt. fáa mánaðarløntir løntakarar, sum hava rætt til frítíð við løn, eitt frítíðarískoyti uppá 1,5% av vunnari løn. Lands-

stýrið skjýtur upp at strika ásetingina um frítíðarískoyti. Fritíðarískoyti, sum vunnið er áðrenn 1. november 1992, verður tó varðveitt.

**Ad § 1, pkt. 6:** Her skjýtur landsstýrið upp at strika reglumar um leinging av frítíð og hækking av frítíðarlønarprosentinum.

**Ad § 2, stk. 1:** Av tí, at ávísir lønarsáttmálar hava ásetingar um frítíðarlønarprosent við grundarlagi í galdandi frítíðarlóg, verður skotið upp, at ásetingar í lønarsáttmálum vera í samsvari við § 10, stk. 1 í lógini.

**Ad § 2, stk. 2:** Ásetingar um frítíðarískoyti sambært sáttmála, siðvenju, gerðardómi o.l., sum hava grundarlag í galdandi frítíðarlóg, verða strikaðar fyri at fáa samsvar við strikingina av § 11, stk. 1, 2. pkt.

**Ad § 2, stk. 3:** Til tess at javnseta tænastumenn og løntakarar annars, tá talan er um frítíðarískoyti, verður skotið upp at strika § 6 í lógini um tænastumannalønir.

**Ad § 3:** Sambært hesi grein verður skotið upp, at broytingarnar í § 1, 1), 2), 4), 5) og 6) fáa gildi frá 1. november 1992.

Frítíð, frítíðarløn og frítíðarískoyti, sum vunnin eru undan hesum degi, verða varðveitt. Ásetingin um starvsfólk í flogfari í § 3 fær tó gildi 2. mai 1993.

**Hjálagt:**
Løgtingslóg nr. 30 frá 7. apríl 1986 um frítíð við løn.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 24/1992: Broyting í løgtingslóg um frítíð við løn v.m.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 30. oktober 1992 og eftir 1. viðgerð 4. november 1992 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og 3 minnilutar.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Anfinn Kallsberg og Birgir Danielsen) vísir á uppskot landsstýrisins um loysn av trupulleikunum hjá arbeiðsloysistryggingini.

Talan er um løgtingsmál nr. 171/1992: Broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn, løgtingsmál nr. 172/1992: Broyting í løgtingslóg um frítíð við løn, løgtingsmál nr. 173/1992: Broyting í løgtingslóg um evnisskráir hjá almennum myndugleikum.

Vísandi til nevndu lógaruppskot og til viðmerkingarnar til hesi uppskot mælir meirilutin til at samtykkja uppskot landsstýrisins við niðanfyristandandi:

**broytingaruppskot**

**til**

**uppskot landsstýrisins**

| | |
|---|---|
| 1) Í § 1 verður nr. 1, nr. 2 og nr. 4 strikað. | 1) I § 1 udgår nr. 1, nr. 2 og nr. 4. |
| 2) Í § 1 verður nr. 3 nr. 1. | 2) I § 1 ændres nr. 3 til nr. 1. |
| 3) Nr. 5 verður nr. 2 og orðað soleiðis:<br>"Í § 11, stk. 1, 2. pkt. verður "1,5%" broytt til: "0,75%". | 3) Nr. 5 ændres til nr. 2 med følgende ordlyd:<br>"I § 11, stk. 1, 2 pkt. ændres "1,5%" til: "0,75%". |
| 4) Í § 3 verður "1. november 1992" broytt til: "1. apríl 1993". | 4) I § 3 ændres "1. november 1992" til: "1. april 1993". |

Ein minniluti (Finnbogi Arge) tekur ikki undir við broytingaruppskoti meirilutans.

Ein annar minniluti (Heini O. Heinesen) førir fram: Fyrst hevur landsstýrið fingið ein part av løntakarafeløgunum saman við Føroya Arbeiðsgevarafelag at gera eitt uppskot til eina arbeiðsloysisskipan, sum tey sjálvi skulu umsita og eisini gjalda við 2% í part, og er henda skipan síðani samtykt í løgtinginum.

Hetta man vera eitt tað størsta offur, sum nøkur samgonga hevur fingið frá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum.

Eitt hálvt ár seinni, ella í oktober 1992, kemur so sama landsstýrið í løgtingið við uppskoti um at lækka frítíðarlønina við lóg 2 1/2%.

Hetta er takkarlønin til løntakaran. Parturin hjá arbeiðsgevaranum er lagdur yvir á løntakaran við 2 1/2%. Hetta svarar til gjaldið hjá arbeiðsgevaranum, bæði í arbeiðsloysisgrunnin 2%, og í arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin 1/2%.

Harafturat gingu partarnir á arbeiðsmarknaðinum við til at framleingja sáttmálan í eitt ár. Í hesum sama ári er landsstýrið komið við omanfyrinevnda lógaruppskoti at lækka lønina (frítíðarlønina) við 2 1/2%.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin (Heini O. Heinesen) undir við teirri semju, ið gjørd er í arbeiðsmarknaðarnevndini í dag.

Hin triði minnilutin (Asbjørn Joensen) kann taka undir við, at lønin, bæði tann almenna og tann privata, skal lækka, og at frítíðarlønin lækkar samsvarandi øðrum lønarlækkingum í samfelagnum. Minnilutin vísir á, at tað ikki samsvarar væl við støðuna á arbeiðsmarknaðinum, at frítíðin sambært frítíðarlógini verður stytt niður í 24 dagar. Vit hava ovurstórt arbeiðsloysi og eiga at nýta øll høvi til tess at rúmka um møguleika teirra arbeiðstøku í arbeiðsmarknaðinum.

# Broytingaruppskot

# til

# 3. viðgerð

**Viðmerkingar:**

Sambært § 10, stk. 2 í løgtingslóg um frítíð við løn, verður frítíðarløgin goldin á konto hjá viðkomandi løntakarafelag, og fellur øll rentan av frítíðarpeninginum sostatt til felagið og ikki til tann, ið frítíðarpeningin eigur.

Samhært galdandi reglum ber løntakarin tó skattin av frítíðarpeninginum burtur av tí partinum av lønini, ið útgoldin verður kontant um bankan. Umframt skattin av frítíðarpeninginum, skattin av lønini annars, gjald til arbeiðsloysistrygging, gjald til eftirlønarskipan og møguligan eykaskatt rindar løntakarin limagjald til lokala yrkisfelagið og FA.

Eyðsýnt er sostatt, at tann í hondini goldni lønarparturin verður soltin.

Fyriliggjandi uppskot miðar í móti at bøta hesi viðurskifti soleiðis, at løntakarin sjálvur fær tilflutt frítíðarlønina á egna konto og fær sjálvur rentuágóðan av síni frítíðarløn.

Haraftrat verður skotið upp, at skatturin av frítíðarløninni verður tikin av innsettu frítíðarlønarupphæddini. Hetta lættir sostatt munandi um skattgjaldingina soleiðis, at útgoldna vikulønin og lýran hjá tí einstaka løntakaranum ella fiskimanninum hilnast betur.

Sostatt verður skotið upp fylgjandi broyting í løgtingslóg nr. 30 frá 7. apríl 1986, løgtingslóg um frítíð við løn.

1) § 10, stk. 2 verður orðað soleiðis:

**Stk. 2.** Frítíðarløgin fellur til gjaldingar og verður skattað samstundis við lønini, og verður frítíðarløgin uttan skatt goldin á bundna konto hjá tí einstaka løntakaranum í føroyskum peningastovni og rentað við teirri til eina og hvørja tíð galdandi hægstu innlánsrentu.

2) Nýtt stk. 3 verður orðað soleiðis:

**Stk. 3.** Peningastovnurin flytir frítíðarløgina smbr. 2. stk. á vanliga konto hjá løntakaranum, tá frítíðin skal haldast, jvb. § 7.

3) Nýtt stk. 4 verður soljóðandi:

**Stk. 4.** Løntakari kann ikki krevja frítíðarløgina útgoldna ella á annan hátt ráða yvir teirri inngoldnu upphæddini, so leingi frítíðarløgin er bundin. Frítíðarløgin kann í sama tíðarskeiði ikki verða fyri úttøku, veðsetast, verða nýtt sum mótrokning ella á annan hátt verða fyri rættarsókn.

4) § 11 stk. 2, 2. pkt. verður orðað soleiðis:

"Samstundis, sum hann fer úr starvinum, verður upphæddin goldin á bundna konto smb. § 10 stk. 2, 3 og 4."

# 25. Løgtingslóg um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m.

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v. m.*

**Samsýning v. m.**

**§ 1.**

Løgmaður verður samsýntur í 40. lønarflokki í tænastumannalógini og landsstýrismenninir í 38. lønarflokki.

**Stk. 2.** Løgmaður fær í borðfæið 60.000 kr. árliga og landsstýrismenn kr. 20.000,- árliga. Borðfæið er skattafrítt.

**Stk. 3.** Landsstýrismenn, sum búgva uttan fyri Suðurstreymoy, hava rætt til frí hús í Tórshavn.

**Stk. 4.** Í staðin fyri frí hús kann landsstýrismaður fáa árligt kostnaðarendurgjald eftir bústaðnum soleiðis:

Suðurstreymoy, undantikið Tórshavn, Argir, Hoyvík og

| | |
|---|---|
| Hvítanes | kr. 40.000,- |
| Norðstreymoy | kr. 55.000,- |
| Eysturoy | kr. 70.000,- |
| Sandoy/Vágar | kr. 100.000,- |
| Aðrastaðni | kr. 115.000,- |

*lagtingslov om vederlag og pension m.v. til landsstyremænd.*

**Vederlag m. m.**

**§ 1.**

Lagmanden aflønnes i henhold til lønramme 40 i tjenestemandsloven og landsstyremændene i lønramme 38.

**Stk. 2.** Lagmanden får et repræsentationstillæg på 60.000 kr. årligt og landsstyremænd 20.000 kr. årligt. Tillægget er ikke skattepligtigt.

**Stk. 3.** Landsstyremænd, som har bopæl udenfor Suðurstreymoy, har ret til fri bolig i Torshavn.

**Stk. 4.** I stedet for fri bolig kan landsstyremænd få et årligt omkostningstillæg efter bopælen således:

Suðurstreymoy, undtagen Tórshavn, Argir, Hoyvík og

| | |
|---|---|
| Hvítanes | kr. 40.000,- |
| Norðstreymoy | kr. 55.000,- |
| Eysturoy | kr. 70.000,- |
| Sandoy, Vágar | kr. 100.000,- |
| Andre steder | kr. 115.000,- |

**Stk. 5.** Landsstýrismaður, sum velur at fáa frí hús í Tórshavn, fær umframt eitt kostnaðarendurgjald, sum er 12.000 kr. árliga.

**Stk. 6.** Kostnaðarendurgjøldini eru ikki skattskyldug.

§ 2.

Tá landsstýrismaður fer frá fær hann landsstýrismannasamsýning eftir hesi reglu:

*Landsstýrismaður í:*

0 - 1 ár ..... 3 mánaðir
yvir 1 ár ..... 6 mánaðir

**Stk. 2.** Doyr landsstýrismaður, meðan hann er í starvi, fær eftirsitandi hjúnafelagi ella børn undir 18 ár samsýning í 6 mánaðir.

**Stk. 5.** Landsstyremand, der vælger fri bolig i Torshavn, får desuden et omkostningstillæg på 12.000 kr. årlig.

**Stk. 6.** Omkostningstillæggene er ikke skattepligtige.

§ 2.

Da landsstyremand fratræder, har han ret til vederlag således:

*Landsstyremand i:*

0 - 1 år ..... 3 måneder
over 1 år ..... 6 måneder

**Stk. 2.** Dør landsstyremand, får efterlevende ægtefælle eller børn under 18 år vederlag i 6 måneder.

## Egineftirløn

§ 3.

Fyrrverandi landsstýrismenn hava rætt til egineftirløn, tá teir verða 67 ár.

**Stk. 2.** Egineftirlønin verður roknað sum partur av hægstu eftirløn í tí lønarflokki, landsstýrismenn eru løntir eftir soleiðis:

*Landsstýrismaður í*

0 til 1 ár ..... 0%
1 til 3 ár ..... 20 %
3 til 5 ár ..... 40 %
5 til 7 ár ..... 50 %
yvir 7 ár ..... 75 %.

**Stk. 3.** Landsstýrismaður, sum bæði hevur verið landsstýrismaður og løgmaður, fær eftirløn sum løgmaður.

## Egenpension

§ 3.

Forhenværende landsstyremænd har ret til egenpension, når de fylder 67 år.

**Stk. 2.** Egenpensionen beregnes som en del af den højeste pension i den lønramme, landsstyremænd er aflønnet efter således:

*Landsstyremand i*

0 til 1 år ..... 0 %
1 til 3 år ..... 20 %
3 til 5 år ..... 40 %
5 til 7 år ..... 50 %
over 7 år ..... 75 %.

**Stk. 3.** Landsstyremand, som både har beklædt stillingen som lagmand og landsstyremand, får pension som lagmand.

**Stk. 4.** Fyrrverandi landsstýrismaður, sum fær samsýning sum løgtingsmaður, hevur ikki rætt til egineftirløn.

**Stk. 5.** Fyrrverandi landsstýrismaður, sum eisini hevur vunnið sær rætt til tænastumannaeftirløn ella løgtingsmannaeftirløn, hevur bert rætt til ta hægstu eftirlønina.

**Hjúnafelagaeftirløn**

**§ 4.**

Eftirsitandi hjúnafelagi eftir landsstýrismann hevur rætt til 2/3 av teirri eftirløn, sum landsstýrismaðurin hevði rætt til uttan so, at tey giftust á deyðastrá, eftir at landsstýrismaðurin hevði fylt 60 ár ella var farin frá sum landsstýrismaður.

**Barnaeftirløn**

**§ 5.**

Eftirsitandi børn undir 18 ár hava rætt til barnaeftirløn sambært § 14, stk. 2 og § 15 í tænastumannaeftirlønarlógini.

**Samskipanarfrádráttur**

**§ 6.**

Reglurnar um samskipanarfrádrátt í kapittul 9 í tænastumannaeftirlønarlógini eru galdandi fyri eftirlønir sambært §§ 3 og **4**.

**Útgjalding og javning**

**§ 7.**

Samsýningarnar og kostnaðarendurgjaldið í § 1 verða útgoldin við 1/12 um mánaðin frammanundan frá 1. degi í

**Stk. 4.** Forhenværende landsstyremand, som oppebærer vederlag som lagtingsmand, har ikke ret til egenpension.

**Stk. 5.** Forhenværende landsstyremand, som også oppebærer egenpension som lagtingsmand eller tjenestemand, har kun ret at modtage den højeste pension.

**Ægtefællepension**

**§ 4.**

Efterlevende ægtefælle efter landsstyremand har ret til 2/3 af den pension, som landsstyremanden havde ret til, medmindre ægteskabet er indgået på dødslejet, efter at landsstyremanden var fyldt 60 år eller var fratrådt som landsstyremand.

**Børnepension**

**§ 5.**

Børn under 18 år af afdød landsstyremand har ret til børnepension efter reglerne i § 14, stk. 2 og § 15 i tjenestemandspensionsloven.

**Samordningsfradrag**

**§ 6.**

Reglerne om samordningsfradrag i tjenestemandspensionslovens kapitel 9 er også gældende for pensioner efter §§ 3 og 4.

**Udbetaling og regulering**

**§ 7.**

Vederlaget i henhold til § 1 udbetales månedlig forud med 1/12 fra den 1. i måneden efter, at landsstyremanden

mánaðinum aftaná, at landsstýrismaður hevur tikið við starvinum, til tann mánaðurin er úti, hann fer frá.

**Stk. 2.** Eftirløn sambært §§ 3, 4 og 5 verður goldin mánaðarliga frammanundan við 1/12 frá 1. í mánaðinum eftir, at fyrrverandi landsstýrismaður hevur fylt 67 ár.

**§ 8.**

Kostnaðarendurgjaldið og borðfæið verða javnað við somu vanligu viðbótum, sum tænastumenn fáa.

**Starvsreglur**

**§ 9.**

Hevur landsstýrismaður, tá hann tekur við, størv í almennari tænastu ella privatum virkjum, samtøkum ella stovnum, skal hann vanliga siga tey frá sær. Tó kann hann í hendinga førum við fyribils samtykki løgmansins halda tílíkum størvum, um løgmaður heldur, at tey ikki kunnu hava við sær trupulleikar í røkjanini av embætisskyldu hansara sum landsstýrismaður. Løgmaður skal, um so er, alt fyri eitt skrivliga senda fíggjarnevnd løgtingsins boð um hetta. Fíggjarnevndin kann innan fyri 14 dagar aftan á móttøkuna sýta avvarðandi landsstýrismanni at halda tílíkum størvum. Eftir hetta tíðarskeið sigur løgmaður løgtingsformanninum frá, hvørji størv avvarðandi landsstýrismaður framvegis hevur loyvi at røkja.

**Stk. 2.** Er løgtingið ikki saman, tá løgmansins fyribils samtykki er fingið, hevur tað gildi, til løgtingið er komið

har tiltrådt embedet og til udgangen af den måned han fratræder.

**Stk. 2.** Egenefterløn efter §§ 3, 4 og 5 udbetales månedlig forud med 1/12 fra den 1. i måneden efter, at forhenværende landsstyremand er fyldt 67 år.

**§ 8.**

Omkostningstillæg og repræsentationsvederlag reguleres med samme generelle tillæg, som tjenestemænd får.

**Stillingsbetingelser**

**§ 9.**

Besidder en landsstyremand ved sin tiltræden hverv i offentlige eller private virksomheders, forctagenders eller institutioners tjeneste, vil disse som regel være at fratræde. Dog kan han undtagelsesvis med foreløbig billigelse af lagmanden bevare sådanne hverv, hvis varetagelse efter dennes skøn ikke kan berede vanskeligheder i udførelsen af hans embedspligt som landsstyremand. Lagmanden skal i så fald straks skriftligt tilstille lagtingets finansudvalg meddelelse herom. Udvalget kan inden 14 dage efter meddelelsens modtagelse nægte den vedkommende landsstyremand tilladelse til at bevare sådanne hverv. Efter forløbet af dette tidsrum meddeler lagmanden tingets formand, hvilke hverv den vedkommende landsstyremand har tilladelse til vedblivende at varetage.

**Stk. 2.** Er lagtinget ikke inde, når lagmandens foreløbige billigelse indhentes, har den gyldighed, indtil lag-

saman og hevur valt fíggjarnevnd. Málið verður viðgjørt eftir reglunum í stk. 1.

**Stk. 3.** Landsstýrismaður má ikki taka móti nøkrum av teimum í stk. 1 í hesi grein nevndu størvum, meðan hann situr sum landsstýrismaður.

**Stk. 4.** Hevur løgmaður, tá landsstýrið tekur við starvi, størv av teim her umrøddu, skal fíggjarnevndin fáa boð um tað, um hann ynskir at halda nøkrum av teimum. Um so er, verður at fara fram eftir reglunum í stk. 1.

**Stk. 5.** Starvið sum løgtingsmaður er undantikið frá reglunum í hesi grein.

**§ 10.**

Um tænastumaður verður valdur til landsstýrismann, hevur hann rætt til farloyvi úr starvi sínum uttan miss í lønar- og eftirlønaraldri, um hildið verður, at embætið tolir tað.

**Gildisásetingar**

**§ 11.**

Reglurnar í § 3 eru galdandi frá 1. mars 1951, tó verða tey ár, fyrrverandi landsstýrismenn hava fingið bíðipening sum landsstýrismenn, drigin frá í eftirlønaraldrinum.

**§ 12.**

Fyrrverandi landsstýrismenn, sum fáa bíðipening, tá henda lóg kemur í gildi, kunnu velja, um teir vilja hava bíðipening ta ásettu tíðina, ella um teir heldur vilja hava rætt til eftirløn sambært reglunum í hesi lóg.

tingets sammentræden og valg af finansudvalg har fundet sted. Sagen behandles efter reglerne i stk. 1.

**Stk. 3.** Ingen landsstyremand må, medens han bestrider stillingen som sådan, overtage noget nyt hverv af den i nærværende paragrafs stk. 1 nævnte art.

**Stk. 4.** Besidder lagmanden ved et landsstyres tiltræden hverv af omhandlede art, skal meddelelse til finansudvalget finde sted deroun, hvis han ønsker at bevare nogen af disse, hvorefter der forholdes i overensstemmelse med stk. 1.

**Stk. 5.** Hvervet som lagtingsmand er undtaget fra bestemmelserne i denne paragraf.

**§ 10.**

Vælges tjenestemand til landsstyremand, er han berettiget til orlov fra sin stilling uden tab i lønnings- og pensionsalder, såfremt det skønnes forsvarligt af hensyn til stillingens tarv.

**Ikrafttrædelsesbestemmelser**

**§ 11.**

Bestemmelserne i § 3 er gældende fra 1. marts 1951, i pensionsalderen fratrækkes de år, forhenværende landsstyremænd har fået ventepenge som landsstyremand.

**§ 12.**

Forhenværende landsstyremænd, som oppebærer ventepenge, da denne lov træder i kraft, kan vælge at modtage ventepenge på fastsatte tidspunkt, eller optjene pension efter denne lov.

**§ 13.**

Lógin fær gildi 1. januar 1993 og fer samstundis úr gildi løgtingslóg nr. 39 frá 5. august 1971 um samsýning landsstýrismanna við seinni broytingum.

**§ 13.**

Loven træder i kraft 1. januar 1993 og samtidig ophæves lov nr. 39 af 5. august 1971 om vederlag til landsstyremænd med senere ændringer.

**Viðmerkingar:**

(Sí viðmerkingar til løgtingsmál nr. 3/1992: Løgtingslóg um samsýning løgtingsmanna.)

**Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:**

ad. § 1. Stk. 1 er óbroytt í mun til galdandi lóg.

ad. stk. 2. Sambært galdandi lóg er tað bert løgmaður, sum fær borðfæ. Í fyriliggjandi uppskoti er ásett, at landsstýrismenn eisini fáa borðfæ.

Orsøkin til uppskotið er, at tað ikki bert er løgmaður, sum longur hevur tær uppgávur, sum eru grundarlagið undir borðfænum, men at allir landsstýrismenn hava tær í ein ávísan mun.

ad. stk. 4 heimilar landsstýrismonnum í staðin fyri at fáa frí hús at kunnu fáa kostnaðarendurgjald eftir líknandi skipan, sum teir fáa í løtuni eftir samtykt landsstýrisins og fíggjarnevndarinnar.

ad stk. 5. stk. er nýtt og ásetir, at landsstýrismaður, sum flytur til Havnar at búgva og fær frí hús, fær eitt ávíst kostnaðarendurgjald, hetta av tí, at hann fær eykaútreiðslur serliga av at ferðast til valdømi sítt.

ad. § 2. Henda greinin er nýggj. Sambært henni fær landsstýrismaður vanliga landsstýrismannaløn í eitt ávíst tíðarskeið aftan,á at hann er farin frá, í staðin fyri bíðipening í 4 ár.

Henda regla er at sammeta við, at fólk, sum verða uppsøgd, skulu hava eina ávísa uppsagnartíð. Og hóast landsstýrismenn hava rætt til farloyvi úr starvi sínum, mugu teir fáa eina ávísa tillagingartíð. Kostnaðurin av hesi skipan verður, um roknað verður við landsstýrisskeiðum á 4 ár og 6 landsstýrismonnum, kr. 1.360.000,- 4. hvørt ár. Til sammetingar kostar verandi skipan við 6 landsstýrismonnum, sum fara frá eftir 4 ár 920.000,- árliga. Hjúnafelagi og børn undir 18 ár fáa eftirsituløn eftir somu reglu, eins og slík regla eisini er galdandi fyri starvsfólk.

ad § 3. Henda reglan er høvuðsbroytingin í uppskotinum.

Í staðin fyri bíðipening vinna landsstýrismenn sær rætt til eftirløn, tá teir fylla 67 ár, um so er, at teir ikki eru landsstýrismenn ella løgtingsmenn tá. Eftirlønin verður roknað út eftir tænastumannaeftirlønini við 37 árum í tí lønarflokki, landsstýrismenn verða løntir eftir og við ávísum % parti av hesi løn, alt eftir livussu

leingi teir hava verið landsstýrismenn. Landsstýrismenn eru í løtuni løntir í 38. lønarflokki og løgmaður í 40. lønarflokki.

Eftirlønin í 38. ávikavist 40. lønarflokki er í løtuni ávikavist 22.446,86 og 25.180,36.

Í stk. 3 verður ásett, at landsstýrismaður, sum bæði hevur verið løgmaður og landsstýrismaður, fær eftirløn sum løgmaður. Orsøkin til, at landsstýrið skjýtur upp, at landsstýrismaður, sum hevur verið landsstýrismaður í 7 ár, fær heili 75% av fullari eftirløn, er, at landsstýrið metir, at tá maður ella kvinna hevur sitið í landsstýri í nærum tvey valskeið, má hetta metast sum eitt slag av lívsstarvi.

ad. stk. 4. Her er ásett, at eftirløn ikki verður latin, um fyrrverandi landsstýrismaður, sum er fyltur 67 ár, framvegis hevur sæti á tingi.

ad. stk. 5. Í stykkinum er ásett, at landsstýrismaður, sum hevur vunnið sær rætt til fleiri almennar eftirlønir, bert hevur rætt til ta hægstu eftirlønina, tá hann fer frá.

Tænastumenn missa ikki eftirlønaraldurin í sambandi við landsstýris- og løgtingsarbeiði.

ad. § 4. Í hesi grein verður ásett, at hjúnafelagi fær 2/3 av teirri eftirløn, landsstýrismaðurin hevði rætt til. Hvat viðvíkur seinna pkt. er hetta eins og tað, sum er galdandi fyri tænastumenn.

ad. § 5. Reglan er tann sama sum í tænastumannalógini. Barnaeftirlønin er í løtuni umleið 25.000,- árliga.

ad. § 6. Samskipanarfrádrátturin er 2% av grunduppheddini í fólkapensiónini fyri hvørt árið, viðkomandi hevur verið landsstýrismaður. Tað merkir, at útreiðslan á hesi konto, tá fyrrverandi landsstýrismenn fáa fólkapensión, minkar nakað.

§§ 7, 8, 9 og 10 eru óbroyttar í mun til galdandi lóggávu.

ad. § 8. Í hesi reglu verður ásett, at lógin er galdandi fyri landsstýrismenn frá 1. mars 1951, tó so, at tann tíð, teir hava fingið bíðipening, verður drigin frá. Orsøkin fyri, at lógin ikki er galdandi frá 1948, er tann, at tað ikki var fyrr enn í 1951, at landsstýrismenn fingu rætt til bíðipening.

Eftir landsstýrisins útrokning verða tvær eftirlønir aktuellar, tá lógin kemur í gildi, eftirlønaraldurin verður 2 ár, og er útreiðslan næsta ár mett til kr. 80.000,-.

ad. § 9. Sum nevnt í notatinum, metir landsstýrið ikki, at lógin kann taka bíðipeningin frá teimum, sum fáa hann í løtuni. Teir fyrrverandi landsstýrismenn, sum fáa bíðipening í løtuni, kunnu í staðin fáa frestandi tíðina talda við í eftirlønaraldri, um teir ynskja tað. Roknast má tó við, at útreiðslan til bíðipening verður nakað tað sama sum eftir fyrrverandi lóg eini 2 - 3 ár aftrat.

# Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 25/1992: Løgtingslóg um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 17. desember 1992 og eftir 1. viðgerð 21. desember 1992 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini hýtt seg í ein meiriluta og tríggjar minnilutar.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Dan Petersen, Anfinn Kallsberg og Birgir Danielsen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein minniluti (Finnbogi Arge) førir fram:

Uppskot landsstýrisins hevur við sær, at bíðipeningur landsstýrismanna fer í søguna. Í staðin fáa landsstýrismenn eftirløn, tá ið teir verða 67 ár. Eftirlønin verður roknað út eftir tænastumannalønini við ávísum prosentparti av hesi løn - eftir áramáli í starvi.

Minnilutin heldur, at skattafría borðfæið eigur at fella burtur bæði fyri løgmann og landsstýrismenn. Skjalprógvaðar útreiðslur eiga at rindast av konto á fíggjarlógini: Landsstýrinum at ráða yvir. Annars eigur ongin samsýning ella løn at verða útgoldin, sum ikki hevur heimild í hesi lóg.

Minnilutin heldur, at kostnaðarendurgjaldið hjá landsstýrismonnum er sett ov høgt og skjýtur upp, at hesi gjøld verða lækkað. Serliga er skattafríða kostnaðarsamsýningin til Vágoy, Sandoy og aðrastaðni (Suðuroy og Norðoyggjar) í hægra lagi.

Minnilutin hevur tí lækkað hesi gjøld lutfalsliga meira í broytingaruppskotinum. Mælt verður til, at kostnaðarendurgjaldið fyri landsstýrismenn lækkar soleiðis:

| **Bústaður** | **Uppskot landsstýrisins** | **Uppskot minnilutans** |
|---|---|---|
| Suðurstreymoy, undantikið Tórhavn, Argir, Hoyvík og Hvítanes | 40.000 kr. | 22.500 kr. |
| Norðstreymoy | 55.000 kr. | 52.500 kr. |
| Eysturoy | 70.000 kr. | 67.500 kr. |
| Sandoy, Vágoy | 110.000 kr. | 82.500 kr. |
| Aðrastaðni | 115.000 kr. | 97.500 kr. |

Samsýningin er sett til hálvaaðru ferð ta upphædd, sum minnilutin skjýtur upp skal verða galdandi fyri løgtingsmenn.

Minnilutin setir sostatt fram hetta:

**broytingaruppskot**

§ 1, stk. 4 verður orðað soleiðis:

"Í staðin fyri frí hús kann landsstýrismaður fáa árligt kostnaðarendurgjald eftir bústaðnum soleiðis:

| | |
|---|---|
| Suðurstreymoy, undantikið Tórhavn, Argir, Hoyvík og Hvítanes | 22.500 kr. |
| Norðstreymoy | 52.500 kr. |
| Eysturoy | 67.500 kr. |
| Sandoy, Vágoy | 82.500 kr. |
| Aðrastaðni | 97.500 kr." |

§ 1, stk. 4 affattes således:

"I stedet for fri bolig kan landsstyremænd få et årligt omkostningstillæg efter bopælen således:

| | |
|---|---|
| Suðurstreymoy, undtaget Tórhavn, Argir, Hoyvík og Hvítanes | 22.500 kr. |
| Norðstreymoy | 52.500 kr. |
| Eysturoy | 67.500 kr. |
| Sandoy, Vágoy | 82.500 kr. |
| Aðrastaðni | 97.500 kr." |

Ein annar minniluti (Heini O. Heinesen) førir fram: Broytingaruppskot til uppskot landsstýrisins í tingmáli nr. 25/1992: Løgtingslóg um samsýning og eftirløn landsstýrismann v.m.

**§ 1, stk. 2:** Løgmaður og landsstýrismenn fáa borðfæ eftir rokning við frágreiðing um nýtsluendamál. Borðfæið er skattafrítt.

**§ 2.** Tá landsstýrismaður fer frá, fær hann landsstýrismannasamsýning í 4 mánaðir, tó fær hann onga samsýning, um hann gerst løgtingsmaður.

**§ 3.** Fyrrverandi landsstýrismenn hava rætt til at stovna eina eftirlønartrygging, sum verður skipað og góðkend av einum kvalifiseraðum meiriluta í fíggjarnevndini javnbjóðis galdandi fyri allar landsstýrismenn, ið velja hesa skipan.

§§ 4, 5, 6, 7 og 8 verða strikaðar. §§ 9, 10, 11, 12 og 13 verða §§ 4, 5, 6, 7 og 8.

Samsvarandi omanfyristandandi setir minniluti (Heini O. Heinesen) fram soljóðandi:

**Broytingaruppskot**

1) § 1, stk. 2 verður orðað soleiðis:

"Løgmaður og landsstýrismenn fáa borðfæ eftir rokning við frágreiðing um nýtsluendamál. Borðfæið er skattafrítt."

1) § 1, stk. 2 affattes således:

"Lagmand og landsstyresmedlemmer får et repræsentationstillæg efter regning med rapportering om anvendelsesformål. Repræsentationstillægget er skattefrit."

2) § 2 verður orðað soleiðis:
"Tá landsstýrismaður fer frá, fær hann landsstýrismannasamsýning í 4 mánaðir, tó fær hann onga samsýning, um hann gerst løgtingsmaður."

3) § 3 verður orðað soleiðis:
"Fyrrverandi landsstýrismenn hava rætt til at stovna eina eftirlønartrygging, sum veðrur skipað og góðkend av einum kvalifiseraðum meiriluta í fíggjarnevndin javnbjóðis galdandi fyri allar landsstýrismenn, ið velja hesa skipan."

4) §§ 4, 5, 6, 7 og 8 verða strikaðar. §§ 9, 10, 11, 12 og 13 verða hereftir §§ 4, 5, 6, 7 og 8.

2) § 2 affattes således:
"Når landsstyremand fratræder får han landsstyremandsvederlag i 4 måneder, dog ikke såfremt han bliver lagtingsmand.

3) § 3 affattes således:
"Forhenværende landsstyremedlemmer har ret til at stifte en pensionsforsikring, der skal etableres efter kvalifiseret flertal i finansudvalget efter samme regler, der er gældende for alle landsstyremedlemmer, der vælger denne ordning."

4) §§ 4, 5, 6, 7 og 8 udgår. §§ 9, 10, 11, 12 og 3 bliver herefter §§ 4, 5, 6, 7 og 8.

# 26. Løgtingslóg um samsýning løgtingsmanna v.m.

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um samsýning og eftirløn løgtingsmanna.*

**§ 1.**

Løgtingsmenn verða samsýntir eftir 17. lønarflokki á 1. stigi í tænastumannalógini.

**Stk. 2.** Aftrat samsýningini verður veitt løgtingsmonnum árligt kostnaðarendurgjald eftir bústaðnum soleiðis:

| | |
|---|---|
| Suðurstreymoy, undantikið Tórshavn, Argir, Hoyvík og Hvítanes | 25.000 kr. |
| Norðstreymoy | 45.000 kr. |
| Eysturoy | 55.000 kr. |
| Vágoy, Sandoy | 80.000 kr. |
| Aðrastaðni | 90.000 kr. |

Kostnaðarendurgjaldið er ikki skattskyldugt.

**Stk. 3.** Løgtingsformaðurin og fíggjarnevndarformaðurin fáa samsýning kr. 74.000,- árliga.

1. og 2. tingskrivari, formaðurin í fiskivinnunevndini og formaðurin í marknaðarnevndini fáa samsýning kr. 50.000,- árliga.

**Stk. 4.** Um løgtingsmaður røkir fleiri enn eitt av teim í stk. 2 nevndu størvum, fær hann tó bert eina eykasamsýning.

*lagtingslov om vederlag og pension til lagtingsmænd.*

**§ 1.**

Lagtingsmænd aflønnes i henhold til lønramme 17, 1. trin i tjenestemandsloven.

**Stk. 2.** Foruden vederlaget ydes der lagtingsmænd et årligt omkostningstillæg efter nedenstående satser:

| | |
|---|---|
| Suðurstreymoy undtagen Tórshavn, Argir, Hoyvík og Hvítanes | 25.000 kr. |
| Norðstreymoy | 45.000 kr. |
| Eysturoy | 55.000 kr. |
| Vágoy, Sandoy | 80.000 kr. |
| Andre steder | 90.000 kr. |

Omkostningstillægget er ikke skattepligtigt.

**Stk. 3.** Der tillægges lagtingsformanden og formanden for finansudvalget ekstra vederlag på kr. 74.000,- årligt.

Der tillægges 1. og 2. tingsekretær, formanden for fiskeriudvalget og formanden for markedsudvalget ekstra vederlag på 50.000 kr. årligt.

**Stk. 4.** Beklæder lagtingsmand flere af disse poster, får han kun udbetalt vederlag for et af hvervene.

**Stk. 5.** Nevndarlimir í løgtingsnevndum fáa fundarpening eins og tænastumenn landsins fyri fundir, ið hildnir verða teir dagar, tá tingið ikki hevur fund. Nevndarformenninir, undantikið formenninir í fíggjarnevndini, fiskivinnunevndini og marknaðarnevndini, fáa fundarpening, sum er helvtina meira enn tað, ið nevndarlimirnir fáa.

§ 2.

Tá løgtingsmaður fer frá, fær hann samsýning í 4 mánaðir.

**Stk. 2.** Doyr løgtingsmaður, meðan hann er í starvi, fær hjúnafelagi ella børn undir 18 ár samsýning í 6 mánaðir.

**Stk. 5.** Udvalgsmedlemmer i lagtingsudvalg får mødehonorar efter reglerne for landets tjenestemænd for tingmøder, der afholdes på dage hvor tinget ikke har møde. Udvalgsformændene, undtagen formændene i finansudvalget, fiskeriudvalget og markedsudvalget, får mødehonorar, som er halvdelen større end de øvrige udvalgsmedlemmers.

§ 2.

Når lagtingsmand fratræder, har han ret til vederlag i op til 4 måneder.

**Stk. 2.** Dør lagtingsmand, får efterlevende ægtefælle eller børn under 18 år vederlag i 6 måneder.

## Egineftirløn

§ 3.

Fyrrverandi løgtingsmenn hava rætt til egineftirløn frá tí, teir eru 67 ár.

**Stk. 2.** Egineftirlønin verður roknað sum partur av hægstu eftirløn í lønarflokkinum, teir eru løntir eftir:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Løgtingsmaður í: | 0 til | 2 ár | 0 % |
| " " | 2 til | 4 ár | 20 % |
| " " | 4 til | 8 ár | 40 % |
| " " | 8 til | 12 ár | 60 % |
| " " | 12 til | 16 ár | 75 % |
| " " | yvir | 16 ár | 90 % |

**Stk. 3.** Fyrrverandi løgtingsmaður, sum fær samsýning sum landsstýrismaður, fær ikki egineftirløn.

**Stk. 4.** Løgtingsmaður, sum eisini hevur vunnið sær rætt til tænastumannaeftirløn ella landsstýrismannaeftir-

## Egenpension

§ 3.

Forhenværende lagtingsmænd har ret til egenpension, når de fylder 67 år.

**Stk. 2.** Egenpensionen beregnes som del af den højeste pension på det løntrin, lagtingsmænd er aflønnet efter således:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Lagtingsmand i: | 0 til | 2 år | 0 % |
| " " | 2 til | 4 år | 20 % |
| " " | 4 til | 8 år | 40 % |
| " " | 8 til | 12 år | 60 % |
| " " | 12 til | 16 år | 75 % |
| " " | over | 16 år | 90 % |

**Stk. 3.** Forhenværende lagtingsmand, som oppebærer vederlag som landsstyremand, har ikke ret til egenpension.

**Stk. 4.** Forhenværende lagtingsmand, som oppebærer egenpension som

løn, hevur bert rætt til ta hægstu eftirlønina.

### Hjúnafelagaeftirløn

§ 4.

Eftirsitandi hjúnafelagi eftir løgtingsmann fær 2/3 av teirri eftirløn, sum løgtingsmaðurin hevði rætt til uttan so, at tey giftust á deyðastrá, eftir at løgtingsmaðurin hevði fylt 60 ár ella var farin frá sum løgtingsmaður.

### Barnaeftirløn

§ 5.

Eftirsitandi børn undi 18 ár hava rætt til barnaeftirløn sambært § 14, stk. 2 og § 15 í tænastumannaeftirlønarlógini.

### Samskipanarfrádráttur

§ 6.

Reglurnar um samskipanarfrádrátt í 9. kapitli í tænastumannaeftirlønarlógini eru galdandi fyri eftirlønir sambært §§ 3 og 4.

### Útgjalding og javning

§ 7.

Samsýningin í § 1 verður goldin við 1/12 frammanundan frá 1. degi í mánaðinum aftaná, at løgtingið hevur góðkent valbrævið hjá viðkomandi løgtingsmanni, til tann mánaðurin er úti, tá løgtingsval hevur verið.

**Stk. 2.** Sigur løgtingsmaður seg frá fyri styttri ella longri tíð við løgtingsins landsstyremand eller tjenestemand, har kun ret til at modtage den højeste pension.

### Ægtefællepension

§ 4.

Efterlevende ægtefælle efter lagtingsmand oppebærer 2/3 af den pension, som lagtingsmanden havde ret til, medmindre ægteskabet er indgået på dødslejet, efter at lagtingsmanden var fyldt 60 år eller var fratrådt som lagtingsmand.

### Børnepension

§ 5.

Børn under 18 år af afdød lagtingsmand har ret til børnepension efter reglerne i § 14, stk. 2 og § 15 i tjenestemandspensionsloven.

### Samordniugsfradrag

§ 6.

Reglerne om samordningsfradrag i tjenestemandspensionslovens kapitel 9 er også gældende for pensioner efter §§ 3 og 4.

### Udbetaling og regulering

§ 7.

Vederlag i henhold til § 1 udbetales månedlig forud med 1/12 fra den 1. i måneden efter, at lagtinget har godkendt vedkommende lagtingsmands valgbrev og til udgangen af den måned, hvor næste lagtingsvalg er afholdt.

**Stk. 2.** Nedlægger lagtingsmand med lagtingets samtykke hvervet for et kort-

samtykt, verður samsýningin v.m. goldin til tann dagin, hann sigur seg frá. Tekur hann við aftur, fær hann samsýning v.m. goldna frá tí degi hann tekur við aftur.

**Stk. 3.** Eftirlønin verður goldin mánaðarliga frammanundan frá 1. degi í mánaðinum eftir, at løgtingsmaðurin hevur fylt 67 ár.

**§ 8.**

Varamaður fyri løgtingsmann fær í samsýning 1/30 av løgtingsmannasamsýning um dagin frá tí degi, hann hevur fingið tingsins góðkenning ella, um hann tekur við seinni, so frá hesum degi, til hann fer frá, ella tá løgtingssetan endar. Tíma- og dagpening fær hann eftir somu reglum sum tænastumenn landsins.

**§ 9.**

Samsýningar eftir hesi lóg verða javnaðar við somu viðbótum, sum tænastumenn fáa.

**Gildisásetanir**

**§ 10.**

Reglurnar í § 3 eru galdandi frá 1. juli 1971, tó verða árini, løgtingsmenn hava fingið bíðipening sum løgtingsmenn, drigin frá í eftirlønaraldrinum.

**§ 11.**

Fyrrverandi løgtingsmenn, sum fáa bíðipening, tá henda lóg fær gildi, kunnu velja, um teir vilja hava bíðipening ta ásettu tíðina, ella fáa rætt til eftirløn sambært reglunum í hesi lóg.

ere eller længere tidsrum, udbetales vederlaget m.v. til den dag, han nedlægger hvervet. Tiltræder han igen, udbetales vederlaget m.v. fra den dag, han tiltræder.

**Stk. 3.** Pensionen udbetales månedlig forud med 1/12 fra den 1. i måneden efter, at forhenværende lagtingsmand er fyldt 67 år.

**§ 8.**

Der udbetales en suppleant for en lagtingsmand i vederlag 1/30 af lagtingsmandsvederlaget pr. dag fra det tidspunkt, han har modtaget lagtingets godkendelse eller, når han tiltræder på et senere tidspunkt, så fra dette til den dag, han fratræder eller til lagtingssamlingens afslutning. Time- og dagpenge udbetales efter samme regler, som gælder for landets tjenestemænd.

**§ 9.**

Omkostningstillæg reguleres med samme generelle tillæg som tjenestemænd får.

**Ikrafttrædelsesbestemmelser**

**§ 10.**

Bestemmelserne i § 3 er gældende fra 1. juli 1971, i pensionsalderen fratrækkes de år, forhenværende lagtingsmænd har fået ventepenge som lagting-smænd.

**§ 11.**

Forhenværende lagtingsmænd, som oppebærer ventepenge, når denne lov træder i kraft, kan vælge at få ventepenge for det fastsatte tidspunkt eller optjene pension efter denne lov.

**§ 12.**

Henda lóg fær gildi 1. januar 1993 og fer samstundis úr gildi løgtingslóg nr. 51 frá 9. mai 1976 um samsýning løgtingsmanna við seinni broytingum.

**§ 12.**

Loven træder i kraft 1. januar 1993 og samtidig ophæves lov nr. 51 af 9. maj 1976 om vederlag til lagtingsmænd med senere ændringer.

**Viðmerkingar:**

Løgtingið hevur samtykt, at landsstýrið í samráð við fíggjarnevndina skal gera uppskot til nýggja lóg um bíðipening løgtings- og landsstýrismanna.

Verandi lógir um samsýning landsstýris- og løgtingsmanna, herundir bíðipeningur, eru frá ávikavist 1971 og 1976. Tað eru seinni gjørdar broytingar í báðum lógunum, og hevur landsstýrið tí, ístaðin fyri at gera broytingaruppskot til verandi lógir, avgjørt at leggja fram uppskot um nýggjar lógir um løn løgtings- og landsstýrismanna.

Høvuðsbroytingarnar í nýggju lógunum eru, at løgtings- og landsstýrismenn í staðin fyri at vinna sær rætt til bíðipening, vinna sær rætt til eftirløn á nakað sama hátt sum tænastumenn landsins og rætt til samsýning í styttri tíðarskeið aftan á, at teir fara úr starvi.

Ein onnur broyting er tann, at reglurnar um kostnaðarendurgjald løgtingsmanna og reglurnar um frí hús til landsstýrismenn verða broyttar. Harumframt verða allar upphæddir umroknaðar til tað, tær eru, í staðin fyri sum er í lógunum frá 1971 og 1976 í grundupphæddum.

Sambært galdandi lóg um løn løgtingsmanna verður kostnaðarendurgjald veitt alt eftir, hvar løgtingsmenn búgva í landinum. Landið er býtt í 3 partar. Tá henda lóg varð gjørd, var tað enn nógv torførari at ferðast millum oyggjarnar, enn tað er í dag, og er tað tí ikki nóg gott samsvar millum kostnaðarendurgjaldið og tær eykaútreiðslur, sum standast av at ferðast til Havnar.

Sum dømi kunnu nevnast, at løgtingsmaður, sum býr t.d í Kirkjubø fær umleið kr. 3.200,- í kostnaðarendurgjaldi um mánaðin og ein í Kollafirði fær kr. 6.000,-, meðan løgtingsmaður, sum býr í Kaldbak onki fær. Tað eru 14 km. millum Havnina og Kirkjubø og millum Havnina og Kaldbak, meðan tað millum Havnina og Kollafjørð, tá tunnilin verður liðugur verða okkurt um 15 km.

Sambært galdandi lóg hava landsstýrismenn, sum búgva uttan fyri Suðurstreymoy, rætt til frí hús í Havn. Síðan 1983-84 hava landsstýrismenn, sum hava ynskt tað, kunnað fingið kostnaðarendurgjald hálva aðruferð tað, tingmenn fáa eftir samtykt fíggjarnevndarinnar. Hendan regla verður nú tikin við í lógina, tó við aðrari upphædd.

Hvat viðvíkur uppskotunum annars verður víst til viðmerkingarnar til tær einstøku greinirnar.

**Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:**

**ad § 1, 1. stk. er óbroytt.**

**ad stk. 2.** Víst verður til tær generellu viðmerkingarnar.

**ad stk. 3.** Formenninir í marknaðarnevndini og fiskivinnunevndini hava fingið eykasamsýning í fleiri ár, í fyriliggjandi uppskoti verður tað lógarfest, men við eini upphædd, sum er 1/3 minni, enn hon er í dag.

**ad § 2.** Skotið verður upp, at løgtingsmaður fær samsýning í 4 mánaðir aftaná, at hann hevur lagt tingstarvið frá sær.

Grundin fyri at skotið verður upp, at landsstýrismenn fáa samsýning í longri tíðarskeið, er, at teir skulu leggja sítt borgarliga starv frá sær, tað skulu tingmenn ikki.

**ad § 3,** Prinsippið er tað sama, sum tað, sum er ásett fyri landsstýrismenn. Eftirlønin 37. ár í 17. lønarflokki á 1. stigi er í løtuni kr. 13.847,96.

Hvat útreiðslan verður, um lógin verður sett í gildi 1. januar 1992, er ilt at meta nágreiniliga um. Tað verða eftir landsstýrisins meting tveir fyrrverandi løgtingsmenn, sum fáa rætt til eftirløn og einar tvær einkjur. Útreiðslan fer at liggja um kr. 100.000,- 1. árið.

**ad §§ 4, 5 og 6.** Óbroyttar í mun til galdandi lóggávu.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 26/1992: Løgtingslóg um samsýning løgtingsmanna v.m.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 17. desember 1992 og eftir 1. viðgerð 21. desember 1992 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og er samd um at broyta uppbýtið í § 1, stk. 3 soleiðis, at 1. og 2. tingskrivari verða bólkaðir fyri seg og somuleiðis, at formaðurin í fiskivinnunevndini og formaðurin í marknaðarnevndini verða bólkaðir fyri seg, og at gera broyting í § 1 hesum samsvarandi.

## broytingaruppskot

| | |
|---|---|
| 1) Í § 1, stk. 3 verður aftan á orðið "árliga." sett sum nýtt stk. 4:<br>"1. og 2. tingskrivari fáa samsýning kr. 50.000 árliga." | 1) I § 1, stk. 3 indsættes efter ordet "årligt." som nyt stk. 4:<br>"Der tillægges 1. og 2. tingsekretær vederlag på kr. 50.000 årlig." |
| 2) Sum nýtt stk. 5 verður sett:<br>"Formaðurin í fiskivinnunevndini | 2) Som nyt stk. 5 indsættes:<br>"Der tillægges formanden for fis- |

| | |
|---|---|
| og formaðurin í marknaðarnevndini kr. 50.000 árliga. | keriudvalget og formanden for markedsudvalget vederlag på kr. 50.000 årlig." |
| 3) Stk. 4 og 5 verða ávikavist stk. 6 og 7. | 3) Stk. 4 og 5 bliver henholdsvis stk. 6 og 7. |

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og tríggjar minnilutar.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Dan Petersen, Anfinn Kallsberg, Birgir Danielsen) mælir annars løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein minniluti (Finnbogi Arge) førir fram:

Uppskotið hjá landsstýrinum hevur við sær, at bíðipeningurin fer í søguna. Í staðin fáa løgtingsmenn eina eftirlønarskipan, sum er roknað út eftir tí áramáli, tingmenn hava sitið á Føroya løgtingi. Minnilutin tekur undir við hesari prinsippbroyting.

Minnilutin heldur, at kostnaðarendurgjaldið hjá løgtingsmonnum er ov høgt sett. Serliga er skattafría kostnaðarsamsýningin til Vágoy, Sandoy og aðrastaðni (Norðoyggjar og Suðuroy) sett í hægra lagi, og hevur minnilutin minkað hesi gjøld lutfalsliga meira í sínum broytingaruppskoti. Mælt verður tí til, at kostnaðarendurgjaldið lækkar soleiðis:

| **Bústaður** | **Uppskot landsstýrisins** | **Uppskot minnilutans** |
|---|---|---|
| Suðurstreymoy, undantikið Tórshavn, Argir, Hoyvík og Hvítanes | 25.000 kr. | 15.000 kr. |
| Norðstreymoy | 45.000 kr. | 35.000 kr. |
| Eysturoy | 55.000 kr. | 45.000 kr. |
| Vágar, Sandoy | 80.000 kr. | 55.000 kr. |
| Aðrastaðni | 90.000 kr. | 65.000 kr. |

Minnilutin heldur, at formanslønin í fiskivinnu- og marknaðarnevndini, ið landsstýrið hevur sett til 50.000 kr., er ov høg. Minnilutin mælir til, at formenninir í hesum báðum nevndum koma undir somu skipan sum formenninir í hinum løgtingsnevndunum, (undantikið fíggjarnevndin). Formanssamsýningin í fiskivinnu- og marknaðarnevndini skal sostatt verða hálvaaðru ferð tað, sum nevndarlimirnir fáa í fundarpeningi teir dagar, tingið ikki er saman.

Minnilutin (Finnbogi Arge) setir sostatt fram hetta:

**broytingaruppskot**

1) § 1, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"Aftrat samsýningini verður veitt løgtingsmonnum árligt kostnaðarendurgjald eftir bústaðnum soleiðis:

| | |
|---|---|
| Suðurstreymoy, undantikið Tórshavn, Argir, Hoyvík og Hvítanes | 15.000 kr. |
| Norðstreymoy | 35.000 kr. |
| Eysturoy | 45.000 kr. |
| Vágoy, Sandoy | 55.000 kr. |
| Aðrastaðni | 65.000 kr. |

Kostnaðarendurgjaldið er ikki skattskyldugt."

2) § 1, stk. 7 verður orðað soleiðis:
"Nevndarlimir í løgtingsvalnevndum fáa fundarpening eins og tænastumenn landsins fyri fundir, ið hildnir verða teir dagar, tá tingið ikki hevur fund. Nevndarformenninir, undantikið formaðurin í fíggjarnevndini, fáa fundarpening, sum er helvtina meira enn tað, ið nevndarlimirnir fáa."

1) § 1, stk. 2 affattes således:
"Foruden vederlaget ydes der lagtingsmænd et årligt omkostningstillæg efter bopælen således:

| | |
|---|---|
| Suðurstreymoy, undtaget Tórshavn, Argir, Hoyvík og Hvítanes | 15.000 kr. |
| Norðstreymoy | 35.000 kr. |
| Eysturoy | 45.000 kr. |
| Vágoy, Sandoy | 55.000 kr. |
| Andre steder | 65.000 kr. |

Omkostningstillægget er ikke skattepligtigt."

2) § 1, stk. 7 affattes således:
"Udvalgsmedlemmer i lagtingsudvalget får mødehonorar efter reglerne for landets tjenestmænd for møder, der afholdes på dage, hvor tinget ikke har møde. Udvalgsformændene, undtagen formændene i finansudvalget, får mødehonorar, som er halvdelen større end de øvrige udvalgsmedlemmers."

Ein minniluti (Heini O. Heinesen) hevur hesa viðmerking:

Broytingaruppskot til uppskot landsstýrisins í tingmáli nr. 26/1992: Løgtingslóg um samsýning løgtingsmanna v.m.

**§ 1, stk. 3:** Løgtingsformaðurin og fíggjarnevndarformaðurin fáa samsýning 74.000 kr. árliga.

**§ 3:** Fyrrverandi løgtingsmenn hava rætt til at stovna eina eftirlønartrygging, sum verður skipað og góðkend av einum kvalifiseraðum meiriluta í fíggjarnevndini javnbjóðis galdandi fyri allar teir tingmenn, ið velja hesa skipan.

**§§ 4, 5, 6 og 7 verða strikaðar.** § 8, seinna pkt. verður strikað. § 8 verður § 4. §§ 9, 10 og 11 verða strikaðar. § 5 verður boylt soljóðandi: "Løgtingsmaður, ið er

burturstaddur í fólkatingsørindum, skal missa 1/30 av sínari løn fyri hvønn dagin, hann er burturstaddur í hesum ørindum."

Samsvarandi hesum setir minnilutin fram soljóðandi:

**broytingaruppskot**

1) §§ 4, 5, 6 og 7 verða strikaðar.
2) § 8, seinna punktum verður strikað, og § 8 verður § 4.
3) §§ 9, 10 og 11 verða strikaðar.
4) § 5 verður orðað soleiðis:
"Løgtingsmaður, ið er burturstaddur í fólkatingsørindum, skal missa 1/30 av sínari løn fyri hvønn dagin, hann er burturstaddur í hesum ørindum."

1) §§ 4, 5, 6 og 7 udgår.
2) § 8, sidste punktum udgår, og § 8 bliver § 4.
3) §§ 9, 10 og 11 udgår.
4) § 5 affattes således:
"Lagtingsmand, der er fraværende i medfør af sin egenskab som folketingsmedlem, skal trækkes med 1/30 af sin løn for hver dag, han er fraværende i udøvelsen af dette arbejde."

Tjóðveldisflokkurin kann ikki taka undir við uppskoti landsstýrisins. Flokkurin heldur tað ikki vera rímiligt, at løgmaður og landsstýrismenn fáa ávikavist 60.000 kr. og 20.000 kr. í borðfæi árliga. Hetta er 180.000 kr. árliga, sum kortini verður goldið av landskassanum.

Skotið verður tí upp, at borðfæ hjá landsstýrismonnum í staðin verður goldið eftir rokning við frágreiðing um nýtsluna.

Flokkurin tekur ikki undir við, at landsstýrismenn fáa løn eitt longri tíðarskeið eftir, at teir eru farnir frá, og skjýtur tí upp, at teir koma undir somu skipan við 4 mánaðum, sum tingmenn eru.

Flokkurin tekur ikki undir við verandi bíðipeningaskipan og tekur heldur ikki undir við uppskoti landsstýrisins um eftirløn, sum ikki er annað enn ein flyting av bíðipeninginum til seinni nýtslu.

Skotið verður upp í staðin, at ting- og landsstýrismenn fáa høvi til at tekna sær eina eftirlønartrygging, sum teir sjálvir lutvíst rinda, so sum skipanin annars er á arbeiðsmarknaðinum.

Eisini verður skotið upp, at bert løgtings- og fíggjarnevndarformaðurin fáa eyka samsýning.

Hin triði minnilutin (Asbjørn Joensen) tekur støðu í tingsalinum.

# 27. Keyp av nýggja skúlanum í Porkeri til miðnámsútbúgvingina í Suðuroy

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

1. Álagt verður landsstýrinum gjøgnum skúlamyndugleikarnar at taka upp samráðingar við Porkeris kommunu um keyp av nýggja skúlanum í Porkeri til miðnámsútbúgvingina í Suðuroy.
2. Álagt verður somu myndugleikum at loysa málið um barnaskúlan í Porkeri í tilknýti til pkt. 1.

**Viðmerkingar:**

Spurningurin um miðnámsútbúgvingina í Suðuroy er framvegis ikki loystur, og vánalig útlit eru fyri at fara undir nýbygging av skúla, so sum tíðirnar eru nú.

Mælt verður tí til at finna eina samlaða loysn fyri miðnámsútbúgvingina í Suðuroy og nýggja barnaskúlan í Porkeri, sum kommunan er komin í fíggjarligt óføri av.

Porkeri liggur miðskeiðis í oynni og røkkur kommunan líka norður í dalin í Hovi, har lógarsamtykt er at byggja nýggjan skúla til miðnámsútbúgving.

Roknast kann við, at landsstýrið kemur inn í myndina við Porkeris skúla fyrr ella seinni, og verður tað tí hildið skilagott, at spurningarnir um:

1) miðnámsútbúgving,
2) fólkaskúla í Porkeri,
3) landsstýrisíløgu upp á 4-6 mió. kr. í eina partvísa miðnámsútbúgving, sum landsstýrið hevur samtykt, men enn ikki boðið út,
4) møguliga kommunusamanlegging millum Porkeri og Vág, verða hildnir saman soleiðis, at ein varandi og nøktandi loysn fæst fyri allar partar á ein fyri samfelagið so bíligan og gagnligan hátt sum gjørligt.

# Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 27/1992: Keyp av nýggja skúlanum í Porkeri til miðnámsútbúgvingina í Suðuroy.*

Málið er lagt fram av Hergeir Nielsen, løgtingsmanni, tann 4. november 1992 og eftir 1. viðgerð 24. november beint í mentannar- og skúlanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Bjarni Djurholm, Jógvan A. Johannessen og Mikkjal Sørensen) tekur ikki undir við málinum, men vísir á, at landsstýrið hevur í fjør keypt hús í Vági til sama endamál.

Ein minniluti (Terje Davidsen) tekur ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

Ein annar minniluti (Signar Hansen) førir fram: Mál nr. 27: Keyp av nýggja skúlanum í Porkeri til miðnámsútbúgvingina í Suðuroy er lagt fram tann 4. november 1992 av Hergeiri Nielsen løgtingsmanni. Skotið verður upp, at landsstýrið tekur upp samráðingar við skúlamyndugleikarnar um at keypa skúlan í Porkeri at nýta til miðnámsútbúgvingarnar í Suðuroy, sum tá verða savnaðar á einum staði.

Hálvt ár er runnið, síðani uppskotið varð lagt á tingbord, og ikki fyrr enn nú verður álitið lagt fram. Meirilutin sigur í sínum áliti, at gamla posthúsið í Vági er keypt til endamálið av landsstýrinum og heldur, at málið harvið er loyst. Minnilutin (Signar Hansen) heldur ikki loysn landsstýrisins verða ta skilabestu, tí henda loysn rúmar ikki øllum flokkum í miðnámsútbúgvingunum samstundis, men verður neyðugt at leita eftir øðrum høluni. Løgtingið hevur sostatt ikki enn fingið greiðu á, um undirvísingin verður á einum staði ella á fleiri, so sum landsstýrið boðar frá í fylgiskjølunum til fíggjarlógina fyri 1993. Sum skilst, so er peningur nýttur til umbygging av gamla posthúsinum í Vági til endamálið, og tá skúlanevndin hevur ligið so leingi á málinum, so er loysnin, ið Hergeir Nielsen vísir á, ikki viðkomandi longur. Minnilutin (Signar Hansen) setir tí einki uppskot fram.

# 28. Viðvíkjandi skuld landsstýrisins til Tvøroyra kommunu

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at gjalda skuld sína til Tvøroya Kommunu fyri nýtsluna av hølum kommununar til virksemi hjá Suðuroyar H.F. skeiði í tíðarskeiðnum 1976-1992.

**Viðmerkingar:**

Síðan 1976 hevur Føroya Landsstýri gjørt nýtslu av hølum í ymiskum føroyskum kommunum til H.F. virksemi. Í einstøkum førum hevur landsstýrið leigað privat høli, í øðrum førum hølir í kommunalum skúlum. Fyri hesi hølir hevur landsstýrið, umframt fast mánaðarligt leigugjald, goldið tær útreiðslur, ið staðist hava av hesum - t.e. leigugjald, goldið tær útreiðslur, ið staðist hava av hesum - t.e. reingerð, umvæling, el, hita, tlf. v.m. - Men sum einasti útleigari hevur Tvøroyrar kommuna onki gjald fingið hvørki leigugjald ella gjald fyri nevndu útreiðslur, sum kommunan øll hesi ár tí hevur lagt út fyri landsstýrið.

Skuldin er um góðar 4 mió. kr. + rentur øll hesi árini.

Í september mánaða í ár spurdi undirritaði landsstýrismannin í fíggjarmálum um hesi viðurskifti og sum høvuðsundanførslu fyri, at landsstýrið einki hevði goldið, førdi hesin fram:

1. Kommunan hevði ongantíð ætlað sær gjald fyri hesa tænastu.
2. Falnar upphæddir eldri en 5 ár vóru "firnaðar".

At Tvøroya Kommuna sjálvsagt ongantíð hevur havt ætlanir um at leggja ókeypis hølir til nýtslu landsstýrisins, framgongur klárt av uppskotinum, sum kommunan í 1984 sendi landsstýrinum, eitt sáttamáluppskot, ið røkkur aftur til 1976.

At Føroya Landsstýri hevur mett, at rætt var at gjalda, framgongur av, at landsstýrið, eftir at hava fingið sáttmálauppskot kommununar, áleggur landsskúlafyrisitingini at taka upp samráðingar við Býráðið á Tvøroyri. Hetta viðførdi, at landsskúlafyrisitingin í 1986 sendir Føroya Landsstýri eitt uppskot til loysn á málinum.

Av svari landsstýrismansins til nevnda fyrispurning frá undirritaða verður tó einki upplýst, hví uppskotið frá landsskúlafyrisitingini til loysn av málinum "strandaði" í landsstýrinum.

Í løtuni bendir nógv á, at hesi viðurskifti millum landsstýrið og Tvøroyrar kommunu enda í rættinum. Hvørt rætturin fer at meta, at talan er um "firning" ella ikki, má sigast at verða hesum máli óviðkomandi. Tí í roynd og veru er her talan um, at Føroya Landsstýri í hesum føri fremur grovan mismun í móti einum parti av borgarum landsins. Tí her skal havast í huga, at onnur pláss í landinum fáa og hava fingið gjald fyri líknandi tænastu - bert ikki Tvøroyri og sostatt teir borgarar, ið har búgva.

At landsstýrið hevur skyldu til at fara eins við øllum borgarum slepst ikki undan, og kann "firning" tí als ikki koma inn í myndina í hesum føri!

40% av grundupphæddini fyri hesa leigu (t.e. 1,6 mió. kr.) hevur Tvøroyrar Býráð tikið við sum inntøku á fíggjarlógini fyri 1992. Iletta tí at býráðið hevur tikið fyri givið, at hetta sjálvsagda mál fór at verða loyst. Nú knappir 2 mánaðar eru eftir av fíggjarárinum, er kommunan sjálvsagt í trongstøðu vegna hesa tørvandi upphædd frá landsstýrinum, og tá seinasti fundur partannan millum, eftir hvat skilst, endaði úrslitaleysur, er neyvan onnur loysn enn, at Føroya Løgting tekur um endan og áleggur landsstýrinum at gjalda hesa skuld.

## Álit

í

*løgtingsmáli nr. 28/1992: Viðvíkjandi skuld landsstýrisins til Tvøroyrar kommunu.*

Málið er lagt fram av Tordi J. Niclasen tann 4. novembar 1992 og eftir 1. viðgerð 6. november 1992 beint í fíggjarnevndina.

Eftir uppskotinum til samtyktar skal verða álagt landsstýrinum at gjalda skuld sína til Tvøroyrar kommunu fyri nýtsluna av hølum kommunar til virksemi hjá Suðuroyar HF-skeiði í tíðarskeiðinum 1976-92.

Í skrivi til fíggjarnevnd løgtingsins hevur landsstýrið søkt um eykajáttan kr. 632.000 til rindan av leigu fyri árini, ið liggja framman fyri 1991. Hesa loysn hevur kommunan góðtikið.

Á fundi í fíggjarnevndini tann 2. desember 1992 varð samtykt at ganga umsókn landsstýrisins á møti.

Málið er sostatt avgreitt endaligt.

# 29. Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald.*

Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald verða gjørdar hesar broytingar:

**§ 1.**

1) § 2, stk. 3, litra j verður orðað soleiðis:
"Banka-, sparikassa- og fíggjarvirksemi. Eisini útleigan av bankaboksum."
2) Í § 3, stk. 1, litra d ganga út orðini: "í kapping við vinnurekandi virki".
3) Í § 5, stk. 7 verður í staðin fyri "31. oktober 1992" sett: "20. november 1992."
4) § 12, stk. 1, litra j verður orðað soleiðis:
"Søla av fiski og skeljadýrum, lindýrum og øðrum ryggleysum vatndýrum (jvb. 3. kap. í Toll- og vøruskránni) og sølu av iðnaðarfiski (jvb. nr. 05.11.91.91 til 05.11.91.99 í Toll- og vøruskránni) frá skipi og/ella alibúki til útflutningsfyritøkur."
5) Í § 16, stk. 3 verður sum uppískoyti til litra a sett: ", undantikið vistir til fiskifør yvir 5 GT".

*lagtingslov om ændring i lagtingslov om meromsætningsafgift.*

I lagtingslov nr. 136 af 8. september 1992 om meromsætningsafgift foretages disse ændringer:

**§ 1.**

1) § 2, stk. 3, litra j affattes således:
"Bank- og sparekasse- samt finansieringsvirksomhed. Også udlejning af bankbokse."
2) I § 3, stk. 1, litra d udgår ordene: "i konkurrance med erhvervsvirksomheder".
3) I § 5, stk. 7 indsættes i stedet for "31. oktober 1992": "20. november 1992."
4) § 12, stk. 1, litra j affattes således:
"Salg af fisk, krebsdyr, bløddyr og andre hvirvelløse vanddyr (jfr. kap 3 i told- og varefortegnelsen) og salt af industrifisk (jfr. pos. 05.11.91.91 til 05.11.91.99 i told- og varefortegnelsen) fra skib og/eller opdrætsanlæg til eksportvirksomheder."
5) I § 16, stk. 3 indsættes som en tilføjelse til litra a: ", undtaget proviant til fiskefartøjer over 5 GT".

6) Í § 16, stk. 3, litra e verða orðini "umboðan og" strikað.
7) § 16, stk. 3, litra f verður strikað.
8) § 16, stk. 6 verður strikað.
9) § 20, stk. 1, 1. pkt. verður orðað soleiðis:

"Skrásett virki skulu seinast 1 mánað og 10 dagar aftan á endan á hvørjum avgjaldstíðarskeiði boða Toll- og Skattstovu Føroya frá støddini á útgangandi og inngangandi avgjaldi í tíðarskeiðinum og støddina á sølu sambært § 12, stk. 1-4 og stk. 7, ið ikki skal roknast við í avgjaldsskylduga sølu."

10) § 22 verður orðað soleiðis:

"§ 22. Avgjaldið fyri eitt avgjaldstíðarskeið fellur til gjaldingar tann 1. í mánaðinum aftan á endan á avgjaldstíðarskeiðinum og skal gjaldast í seinasta lagi 1 mánað og 10 dagar aftan á endan á avgjaldstíðarskeiðinum.

**Stk. 2.** Verður avgjaldið ikki goldið til tíðina, skal 1,5% gjaldast í mánaðarligari rentu frá tí degi, gjaldið er fallið til gjaldingar, tó í minsta lagi 100 kr. fyri eitt avgjaldstíðarskeið. Renta verður ikki goldin av einari hækking sambært § 21, stk. 1 av avgjaldinum."

11) § 40, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"Virki, ið eru skrásetingarskyldug sambært hesi lóg, og sum hava uppgjørt goymsluna pr. 31. desember 1992, og sum hava sent inn uppgerðina fyri 1. juli 1993, fáa 100% av innflutingsgjaldinum sambært løgtingslóg nr. 119 frá 23. desem-

6) I § 16, stk. 3, litra e udgår ordene "repræsentation og".
7) § 16, stk. 3, litra f udgår.
8) § 16, stk. 6 udgår.
9) § 20, stk. 1, pkt. 1 affattes således:

"Registrerede virksomheder skal senest 1 måned og 10 dage efter afslutningen af hver afgiftsperiode opgive til Toll- og Skattstova Føroya størrelsen af udgående og indgående afgift i perioden og størrelsen af den omsætning i henhold til § 12, stk. 1-4 og stk. 7, som ikke skal medregnes til den afgiftspligtige omsætning."

10) § 22 affattes således:

"§ 22. Afgiften for en afgiftsperiode forfalder til betaling den 1. i måneden efter udløbet af afgiftsperioden og skal betales senest 1 måned og 10 dage efter udløbet af afgiftsperioden.

**Stk. 2.** Betales afgift ikke rettidigt, skal der betales 1,5% i månedlig rente fra forfaldsdagen, dog mindst 100 kr. for en afgiftsperide. Der betales ikke rente af en i henhold til § 21, stk. 1 foretaget forhøjelse af afgiften."

11) § 40, stk. 1 affattes således:

"Virksomheder, der er registreringspligtige i henhold til denne lov, og som har opgjort lager pr. 31. december 1992, og som har indsendt opgørelsen før 1. juli 1993, får 100% af indførselsafgiften i henhold til lagtingslov nr. 119 af

ber 1991 um innflutningsgjald, ið er goldið fyri vørur, ið eru innfluttar til víðari sølu, og sum ikki eru seldar fyri 1. januar 1993, endurgoldið í 1993 og 1994."

12) § 40, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"Stk. 2. Innflutningsgjaldið sambært hesi grein verður endurgoldið í mun til uppgjørda virðið á vørugoymsluni og verður útgoldið í 4 eins stórum pørtum í samsvari við avrokningartíðarskeiðið sambært § 20, í sambandi við 2. og 3. avrokningartíðarskeið í 1993 og 1. og 2. avrokningartíðarskeið í 1994."

13) § 42 verður orðað soleiðis:
"§ 42. Henda lóg fær gildi 1. januar 1993. Tó fær § 5 gildi 1. oktober 1992, og § 40 fær gildi 10. november 1992."

23. december 1991 om indførselsafgift, som er betalt for varer, der er indført til videre salg, og som ikke er solgt inden 1. januar 1993, tilbagebetalt i 1993 og 1994".

12) § 40, stk. 2 affattes således:
"Stk. 2. Indførselsafgiften i henhold til denne bestemmelse tilbagebetales i henhold til den opgjorte værdi af varelageret, og udbetales i 4 lige store rater i overensstemmelse med afregningsperioden i henhold til § 20, i forbindelse med 2. og 3. afregningsperiode i 1993 og 1. og 2. afregningsperiode i 1994."

13) § 42 affattes således:
"§ 42. Denne lov træder i kraft 1. januar 1993. Dog træder § 5 i kraft 1. oktober 1992, og § 40 træder i kraft den 10. november 1992."

**§ 2.**
**Ígildissetanarreglur**

Henda lóg fær gildi 1. januar 1993. Tó fáa § 1, pkt. 4, pkt. 12, pkt. 13 og pkt. 14 gildi, dagin eftir, at henda lóg er kunngjørd.

**§ 2.**
**Ikrafttrædelsesregler**

Denne lov træder i kraft 1. januar 1993. Dog træder § 1, pkt. 12, pkt. 13 og pkt. 14 i kraft dagen efter denne lovs bekendtgørelse.

**Viðmerkingar:**

Í samband við, at lógaruppskotið um meirvirðisgjald varð samtykt, gjørdi landsstýrið av, at Føroya Tollstova og Líkningarráð Føroya skuldu leggjast saman til ein stovn, ið fekk heitið Toll- og Skattstova Føroya.

Orsøkin til samanleggingina er fyrst og fremst at gera umsitingina av tolli, meirvirðisgjaldi og skatti so bíliga og effektiva sum yvirhøvur tilber.

Aftaná, at lógin um meirvirðisgjald varð samtykt, hevur landsstýrið, í tann mun tað letur seg gera, arbeitt við at samskipa reglurnar í skattalógini við reglurnar í lógini um meirvirðisgjald, og annars at gera reglurnar í meirvirðisgjaldslógini so einfaldar sum møguligt.

Møguliga verður neyðugt at broyta MVG-prosentið í samband við framløguna av fíggjarlógini fyri 1993. Landsstýrið fer at heita á skattanevndina um at koma við broytingaruppskoti til 2. viðgerð, og so verður.

Í samband við hetta arbeiði skjýtur landsstýrið upp at gera niðanfyristandandi broytingar í løgtingslóg um meirvirðisgjald.

**Viðmerkingar til tær einstøku greinarnar:**

til pkt. 1:

Í § 2, stk. 3, litra j í løgtingslóg um meirvirðisgjald er ásett, at útleigan av bankaboksum er avgjaldsskyldug.

Uppskot landsstýrisins er, at hetta verður broytt soleiðis, at útleigan av bankaboksum verður undantikin meirvirðisgjaldi.

Við hesari broyting sleppur Toll- og Skattstova Føroya eisini undan umsiting, hvørs kostnaður ikki stendur mát til ta inntøku, ið stendst av umsitingini.

**Til pkt. 2:**

Í § 3, stk. 1, litra d í løgtingslóg um meirvirðisgjald er ásett, at almennir stovnar, ið ikki eru almenn veitingarvirki sambært § 3, stk. 1, litra c, bert eru meirvirðisgjaldsskyldugir, um teir selja vørur og avgjaldsskyldugar tænastur í kapping við vinnurekandi virki. Skotið verður upp, at reglan um kapping gongur út. Vørur og tænastur frá Rúsdrekkasølu Landsins, Tjaldurs Apoteki, Landsverkfrøðinginum, Matrikkulstovuni, Bileftirlitinum v.m. verða sostatt avgjaldsskyldugar.

**Til pkt. 3:**

Í løgtingslóg um meirvirðisgjald § 5, stk. 7 er ásett, at virki, ið skulu skrásetast sambært løgtingslóg um meirvirðisgjald, skulu fráboða seg til skrásetingar í seinasta lagi 31. oktober 1992.

Í § 42, stk. 2 er ásett, at henda skráseting skal gerast í seinasta lagi 20. november 1992. Fyri at rætta hesa villu verður freistin fyri skráseting í § 5, 7. stk. broytt til 20. november 1992.

**Til pkt. 4:**

Í § 12, stk. 1, litra j í løgtingslóg um meirvirðisgjald er ásett, at avgjaldsskyldug søla ikki fevnir um sølu av fiski og skeljadýrum, lindýrum og øðrum ryggleysum

vatndýrum (jbr. 3. kap. í toll- og vøruskránni) undantikið sølu til heilsølu ella smásølu.

Undantakið fevnir ikki um sølu av ídnaðarfiski.

Broytingin í hesi grein hevur við sær, at avgjaldsskyldug søla ikki fevnir um sølu av ídnaðarfiski. Treyt fyri, at søla kann haldast uttan fyri avgjaldsskylduga sølu, er, at talan er um sølu frá skipum og/ ella alibrúkum beinleiðis til útflutningsfyritøkur.

**Til pkt 5:**

Í § 16, stk. 3, litra a í løgtingslóg um meirvirðisgjald er ásett, at virki ikki kunnu rokna avgjald av mati til handhava og starvsfólkið á virkinum við í inngangandi avgjald.

Uppskot landsstýrisins er at broyta hesa reglu soleiðis, at avgjald á vistum til fiskfør yvir 5 GT kann roknast við í inngangandi avgjald.

**Til pkt. 6:**

Í § 16, stk. 3, litra e í løgtingslóg um meirvirðisgjald er ásett, at avgjald av umboðan og gávum ikki kunnu roknast við í inngangandi avgjald.

Fyri at samskipa reglurnar í skattalógini við reglurnar í lógini um meirvirðisgjald verður skotið upp, at avgjald á umboðan kann roknast við í inngangandi avgjald.

Fyri at samskipa reglurnar í skattalógini við reglurnar í lógini um meirvirðisgjald verður skotið upp, at avgjald á útvegan og rakstri av persónmotorakførum kann roknast við í inngangandi avgjald.

**Til pkt. 8:**

Í samband við broytingina í § 16, stk. 1, litra f verður neyðugt at strika stk. 6 í § 16.

**Til pkt. 9:**

Í § 20, stk. 1 í løgtingslóg um meirvirðisgjald er ásett, at skrásett virki í seinasta lagi 25 dagar aftan á hvørt avgjaldstíðarskeið, skulu geva upp støddina á inn- og útgangandi avgjaldi, og sølu, ið sambært § 12, 1.-4. stk., ikki skal roknast við í avgjaldsskyldugu søluna.

Landsstýrisins uppskot er at leingja kredittíðina til 1 mánað og 10 dagar. Haraftrat er ein teknisk rætting til hesa grein soleiðis, at virki, ið selja bøkur, eisini skulu geva upp støddina á inn- og útgangandi avgjaldi og á avgjaldi, ið kann haldast uttan fyri avgjaldsskylduga sølu. Við hesari broyting fylgir landsstýrið áheitanini frá vinnufeløgum og grannskoðarum um at geva virkjunum meira tíð at gera upp avgjaldið og at brúka nøkulunda somu kredittíð, sum londini rundan um okkum brúka.

**Til pkt. 10:**
Fyri at samsvar skal vera millum broytingina í § 20 og § 22 í lógini verður skotið upp, at avgjaldið fellur til gjaldingar tann 1. í mánaðinum aftan á endan á avgjaldstíðarskeiðinum og skal gjaldast í seinasta lagi 1 mánað og 10 dagar aftaná endan á avgjaldstíðarskeiðinum, haraftrat er ein málslig rætting framd í § 22, stk. 2 í lógini.

**Til pkt. 11:**
Í § 40, stk. 1 í løgtingslóg um meirvirðisgjald er ásett, at virki, ið skulu hava innflutningsgjaldið á vørum, ið eru keyptar til víðari sølu, og sum ikki eru seldar áðrenn 1. januar 1993, endurrindað, skulu senda inn uppgerðina fyri 1. februar 1993.

Aftaná, at lógin um meirvirðisgjald varð samtykt, hava grannskoðarar og vinnufeløg ført fram, at teir ongan møguleika hava at gera upp og senda inn uppgerðina áðrenn 1. februar 1993.

Landsstýrisins uppskot er ti at leingja freistina at lata inn uppgerðina til 1. juli 1993.

**Til pkt. 12:**
Í § 40, stk. 2 í løgtingslóg um meirvirðisgjald er ásett, at virki fáa innflutningsgjaldið endurrindað í trimum pørtum fyrstu ferð í samband við annað avrokningartíðarskeið í 1993.

Landsstýrisins uppskot er at broyta hesa reglu soleiðis, at innflutningsgjaldið verður endurgoldið í 4 eins stórum pørtum, 10. august 1993, 10. november 1993, 10. mai 1994 og 10. august 1994.

**Til pkt. 13:**
Løgtingslóg um meirvirðisgjald fær ikki gildi fyrr enn 1. januar 1993. Tó fekk § 5 í lóg um meirvirðisgjald, greinin viðvíkur skráseting, gildi tann 1. oktober 1992.

Landsstýrisins uppskot er, at § 40 í lóg um meirvirðisgjald saman við § 1, pkt. 4, pkt. 12, pkt. 13 og pkt. 14 í hesi lóg fáa gildi 10. november 1992.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 29/1992: Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 4. november 1992 og eftir 1. viðgerð 6. november 1992 beint í skattanevndina.

Ein samd nevnd mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins, men mælir samstundis til, at orðingin í § 40, stk. 4 í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald: "løggildum ella skrásettum" verður strikað, og at í fyriliggjandi uppskoti verður undir pkt. 13, § 42 broytt soleiðis, at dagfestingin 10. november 1992 verður broytt til 12. desember 1992 og setir fram soljóðandi:

**broytingaruppskot**

**til**

**uppskot landsstýrisins**

| | |
|---|---|
| 1) Sum nýtt pkt. 13 verður sett:<br>Í § 40, 4. stk. verða orðini: "løggildum ella skrásettum" strikað.<br>Pkt. 13 verður pkt. 14. | 1) Som nyt pkt. 13 indsættes:<br>I § 40, stk. 4 udgår ordene: "autoriseret eller registreret".<br>Pkt. 13 bliver pkt. 14. |
| 2) Í § 42, pkt. 14 verður dagfestingin: "10. november 1992" broytt til: "12. desember 1992". | 2) I § 42, pkt. 14 ændres datoen: "10. november 1992" til: "12. desember 1992". |

**Broytingaruppskot**

**í**

*løgtingsmáli nr. 29/1992: Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald.*

Av tekniskum orsøkum verður mælt til fylgjandi broytingar:

| | |
|---|---|
| 1) Í uppskoti landsstýrisins verður § 1, pkt. 2 strikað. | 1) I landsstyrets forslag § 1 annulleres pkt. 2. |
| 2) Sum nýtt pkt. 2 verður sett:<br>"Í § 1, 3. stk., litra g verður strikað:<br>"Tó er pakkapostur avgjaldsskyldugur." | 2) Som nyt pkt. 2 indsættes:<br>"I § 1, stk. 3, litra g udgår:<br>"Afgiftspligtig er dog pakkepost." |
| 3) Í § 40, stk. 4, verður skoytt uppí aftaná "váttast av": "løggildum ella skrásettum grannskoðara ella av persónum, sum verða góðkendir av Toll- og Skattstovu Føroya." | 3) I § 40, stk. 4 tilføjes efter "underskrives af en": "autoriseret eller registreret revisor eller af personer, der er godkent af Toll- og skattstova Føroya." |

4) § 1, pkt. 10, verður orðað soleiðis:
"§ 22. Avgjaldið fyri eitt avgjaldstíðarskeið fellur til gjaldingar og skal gjaldast í seinasta lagi 1 mánað og 10 dagar aftan á endan á avgjaldstíðarskeiðinum."

**2. stk.** Verður avgjaldið ikki goldið til tíðina, skulu 1,5% gjaldast í mánaðarligari rentu frá seinasta rættstundis gjaldingardegi. Rentuskuldskrivingin er í minsta lagi 100 kr. um mánaðin. Rentan verður somuleiðis goldin av einari hækking sambært § 21, 1. stk. av avgjaldinum frá seinasta rættstundis gjaldingardegi.

**3. stk.** Reglurnar í 2. stk. eru eisini galdandi fyri skuldskrivaða rentu."

4) § 1, pkt. 10 formuleres således:
"§ 22. Afgiften for en afgiftsperiode forfalder til betaling og skal erlægges senest 1 måned og 10 dage efter udløbet af afgiftsperioden".

**Stk. 2.** Betales afgift ikke rettidigt, skal der betales 1,5% i månedlig rente fra sidste rettidige betalingsdag. Rentetilskrivningen udgør mindst 100 kr. om måneden. Der betales tillige rente af en i henhold til § 21, stk. 1 foretaget forhøjelse af afgiften fra sidste rettidige betalingsdag.

**Stk. 3.** Reglerne i stk. 2 er også gældende for tilskrevet rente."

# 30. Broyting í reglunum um val av nevndarlimum í Tryggingarsambandinum Føroyar

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at broyta reglumar um val av nevndarlimum í Tryggingarsambandinnm Føroyar soleiðis, at hesar verða í samsvar við nútíðar vanliga galdandi reglur við atliti at, at hvør limur skal standa fyri vali hvørt fjórða ár, og at varalimir verða valdir fyri vanligu limirnar.

**Viðmerkingar:**

Sambært § 6 í løgtingslóg nr. 24 frá 28. mars 1956 um trygging við seinni broytingum eru 5 limir í nevndini, av teimum velur umboðsmannaráðið ein, løgtingið tveir og landsstýrið tveir.

Skipanin í dag inniber, at ein limur kann verða sitandi upp til heili 15 ár. Metast má, at hetta ikki er tíðarhóskandi og ikki í samsvar við tær demokratisku reglur, sum í dag galda á slíkum økjum, eins og tað má metast óheppið, at sami persónur situr órímiliga leingi í nevndarsessum í almennum starvi orsakað av fyrisitingarligum reglum. Almenni áhugin má vera, at mál kunnu viðgerast og spumingar loysast so breitt sum gjørligt, og er tí ein slík miðsavnan ikki til fyrimuns fyri borgaran.

Tað næsta sjónarmiðið er, at tá eingir varalimir eru valdir, kann tað koma fyri, at ein minniluti í einstøkum førum kann koma at taka avgerðir, sum ikki eru demokratiskt borðbærar, tá mótgangandi áskoðanir ikki koma á borðið vegna vantandi varmenn. Hetta er tí alneyðugt at fáa broytt skjótast.

Samanumtikið eiga hesar reglur at nútíðargerast, bæði út frá áhugamálum borgarans og út frá tí, at nevndin sjálvandi er bundin av teimum fyriskipanum í galdandi lóg ásettar.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 30/1992: Broyting í reglunum um val av nevndarlimum í Tryggingarsambandinum Føroyar.*

Málið er lagt fram av Henrik Old, løgtingsmanni, tann 6. november 1992 og eftir 1. viðgerð 13. november 1992 beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við Tummas Arabo, landsstýrismann.

Landsstýrismaðurin upplýsti fyri nevndini, at landsstýrið arbeiðir við at broyta tryggingarlóggávuna, herundir eisini bygnaðin, og kemur lógaruppskot hesum viðvíkjandi á tingborð í ólavsøkutingsetuni.

Broytingar í samfelagnum krevja, at lógir og samtyktir fyri tryggingarsamtakið verða nútímansgjørdar.

Meirilutin er samdur um, at bygnaðurin er gamal og ótíðarhóskandi og eigur at verða broyttur frá grundini.

Meirilutin heldur ikki, at tað er rætt, at byrjað verður at gera smábroytingar í bygnaðinum nú, tá landsstýrið hevur boðað frá, at teir arbeiða við málinum og eisini tí, at landsstýrið er bundið til, mótvegis donsku stjórnini, at fremja neyðugar tíðarhóskandi broytingar.

Meirilutin (Mikkjal Sørensen, Bjarni Djurholm og Elicsar Arge) tekur ikki undir við málinum og setir eitki uppskot fram.

Minnilutin (Heðin Mortensen) tekur ikki undir við uppskotinum. Minnilutin mælir til, at einkarrætturin hjá tryggingarsambandinum verður tikin av.

Tí verður soljóðandi uppskot sett fram:

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum í ólavsøkutingsetuni 1993 at leggja fyri løgtingið uppskot um at taka av einkarrættin hjá Tryggingarsambandinum.

Minnilutin (Signar Hansen), mælir til at samtykkja uppskot Henrik Olds.

# 31. Viðvíkjandi arbeiðsháttí landsstýrisins

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Í samband við ætlaðu "sparitiltøk" landsstýrisins verður álagt landsstýrinnm at leggja eina "heildarloysn" fyri tingið - og ikki sum higartil, eitt uppskot nú og eitt annað tá.

**Viðmerkingar:**

Føroya land er sum kunnugt komið undir útlendska fyrisiting og er hetta ikki bert ein "falitterklæring" fyri politiska myndugleikan, men stór skomm fyri alla tjóðina og fólkið, ið her búleikast.

Ein av mongu treytunum frá Forsætisráðstovuni fyri at veita tær 500 mió. kr. er, at "landsstyret opstiller et realistisk finanslovforslag med balance mellem indtægter og udgifter for 1993." Somuleiðis er uttanífrá álagt landsstýrinum at "følge et økonomiskpolitisk stabiliseringsprogram". Hetta skal verða gjørt innan 4 mánaðir eru farnir og eftir altjóða reglum. Hetta arbeiði sleppur landsstýrið ikki at gera, men útlendingar læntir frá IMF.

Fyri at lúka treytina viðvíkjandi fíggjarlógini hava ymisk politisk signal verið at hoyrt úr landsstýrinum og hevur landsstýrið eisini lagt okkurt mál fyri tingið.

Hesi mál viðvíktu sokallaðum "karensdøgum" og at frítíðin og fríðtíðarprosentið skuldi minkast.

Í viðmerkingum til hesi mál varð upplýst, hvussu nógv landsstýrið metti seg at spara.

Øllum kunnugt er samfelagið í kreppu - ein kreppa sum fyrst og fremst er politiskt skapt - og tí er og verður neyðugt við tiltøkum. Tiltøk, sum eiga at verða grundarlagið undir eini heildarloysn.

Tí er tað ørkymlandi, at landsstýrið bert kemur við einum uppskoti nú og einum øðrum tá, og samstundis sigur, at uppskotini hava til endamáls at betra um fíggjar- og búskaparstøðuna í samfelagnum. Hetta er ørkymlandi fyri politisku andstøðuna á tingi!

Hetta er ørkymlandi fyri fakfeløgini!

Hetta er ørkymlandi fyri allar landsins borgarar!

Tí eigur landsstýrið at koma í tingið við einum samlaðum "heildarpakka", sum er teirra boð upp á loysn av samfelagskreppuni.

Fyrst tá fáa andstøðan, fakfeløgini og allir landsins borgarar eina greiða mynd av, hvussu sitandi landsstýrið veruliga ætlar at loysa kreppuna.

Eitt slíkt uppskot kann tá eisini verða grundarlag fyri at:

1) andstøðan niedvirkar til skilagóðar loysnir
2) fakfeløgini aktivt verða tikin við í eini heildarloysn
3) landsins borgarar gjølla verða kunnaðir um veruligar ætlanir.

Í hesum álvarstíðum eiga ongar "panikkloysnir" at vinna frama. At menn frá IMF um stutta tíð koma til landið, rættvísger heldur ikki "panikkloysnum". Hesar koma samfelagnum altíð aftur um brekku! Dømi um "panikkloysn" kann m.a. nevnast, ætlanir landsstýrisins at sindra landssjúkrahúsið! Tá hugsað verður um sváru avleiðingarnar av slíkari ætlan, og hesar átti landsstýrið at sæð, hava slíkar ætlanir:

- einki ffggjarligt mál
- einki fakligt mál
- einki samfelagsligt mál

men, haraftur tykist einki annað eun havandi eitt miðvíst politiskt mál.

Í eina heildarætlan eiga sjálvandi nógvir samfelagsspurningnar at verða tiknir við. Grundleggjandi er tó inntøkugrundarlagið hjá føroyska húsarhaldinum og hvussu samfelagságóðin skal býtast. Í eini heildarætlan eigur sjálvandi eisini hædd at verða tikin fyri:

- arbeiðsloysistrupulleikanum
- tænastustøðinum í samfelagnum

- almennu umsitingini
- skattapolitiskum spurningum
- langtíðarætlanum
- tilfeinginum í havinum
- alternativum inntøkumøguleikum

bert fyri at nevna nøkur fá dømi.

Tá landsstýrið eftir øllum at døma hevur ætlanir um fleiri sokallað "sparingartiltøk", vónar uppskotsstillarin, at meirilutin á tingi skilir týdningin av, at uppskot landsstýrisins koma sum ein "pakki" í tingið og ikki sum higartil - eitt nú og eitt annað tá - og áleggur landsstýrinum hetta.

# 32. Viðvíkjandi stovnsrøktartiltøkum

**Uppskot**

til

**samtyktar**

Við atliti at, at minka av trolaraflotanum, verður álagt landsstýrinum at seta í verk neyðug stovnsrøktartiltøk.

**Viðmerkingar:**

Tey seinnu árini er av álvara vend komin í føroyska búskapin soleiðis, at í dag stendur á, og mangt eitt húski hevur tað sera trupult.

Hvat inntøkugrundarlagi okkara viðvíkur - rávøran úr havinum - hevur so mangan verið víst á, at flotin hevur verið ov stórur og trýstið á fiskastovnarnar verið alt ov stórt.

Tíverri hava ávarðingarnar ikki verið tiknar í nóg stórum álvara og hava vit livað, sum um "havið var ótømandi".

Nú vakna vit við kaldan dreym og mega ásanna, at støðan er sera álvarslig.

Afturgongdin í fiskiskapinum hevur verið sera stór og kann sum dømi nevnast, at útróðrarbátar norðanfyri, sum fyri fáum árum síðani fingu eini 100-200 pund upp á stampin, nú mangan liggja um eini 25-50 upp á stampin - og enntá minni!

Hvussu gingist hevur við heildarveiðuni undir Føroyum eru tøl fyri stuttum almannakunngjørd um.

Í 1988 var veiðan eftir toski uml. 26.000 t., í 1991 var talið komið niður á 9.500 t.

Veiðan av hýsu var í 1988 12.000 t., meðan hon í 1991 var 7.500. Stovnsrøktartiltøk hava øll hesi árini í ávíst mát verið sett í verk. Her verður t.d. hugsað um friðingartiltøk í avmarkaðum øki til avmarkaðar tíðir.

Havandi hættisligu støðuna í huga, metir uppskotsstillarin, at munabetri tiltøk eiga at verða sett í verk - og nú afturberingin til fiskivinnuna á fíggjarlógini fyri 1993 hevur fingið ein rættiligan frammaná, sleppa vit ikki undan at seta í verk lívsneyðug tiltøk at verja tað, sum eftir er av fiskastovninum. Tí má trolaraflotin minkast (djúpvatnsflotin undantikin) og eiga vit í staðin at varðveita og fjálga um línu/húkaveiðuna.

Húkaveiðan gevur meira arbeiði - bæði á sjógvi og landi og er uttan iva mest rentabul. Hon er gagnligast fyri stovnsrøktina og gevur uttan iva bestu rávøruna.

Tí er hetta eisini ein samfelagsgagnlig loysn!

Verður einki nú av álvara gjørt, so er vandi fyri, at stovnarnir heilt og fult verða niðurfiskaðir, og tá verður einki til nakran og fortreytimar fyri livilíkindum her á landi burtur.

## Álit

### í

*løgtingsmáli nr. 32/1992: Viðvíkjandi stovnsrøktartiltøkum.*

Málið er lagt fram av Tordi J. Niclasen tann 13. november 1992 og eftir 1. viðgerð 24. november 1992 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Henrik Old, Frank Davidsen, Anfinn Kallsberg og Olaf Olsen) førir fram, at uppskotsstillarin mælir til at minka um trolaraflotan og at álagt verður landsstýrinum at seta í verk neyðug stovnsrøktartiltøk. Víst verður í hesum sambandi á tingmál nr. 81/1992: Løgtingslóg um stuðul til feskfiskaflotan, har talið av veiðiloyvum til feskfiskifør yvir 20 BRT er ásett og sum heimilar landsstýrinum at minka um talið av veiðloyvum, so hvørt veiðiloyvi verða latin inn, niður í ávíst ásett skipatal. Hetta verður gjørt, so fiskiflotin undir Føroyum verður lagaður eftir tí tilfeingi, ið er. Eisini verður víst á løgtingslóg nr. 8 frá 29. mars 1978 um fiskiveiðu á landleiðini, har landsstýrinum eftir samráð við løtingsins fiskivinnunevnd er heimilað við kunngerð at áseta reglur um, hvussu fiskiskapur skal fremjast á landleiðini. Meirilutin tekur tí ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Jógvan Ingvard Olsen og Terje Davidsen) metir, at fiskivinnan eigur at verða viðgjørd sum heild bæði á sjógvi og landi og tekur tí ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Heini O. Heinesen) tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja fyriliggjandi uppskot. Víst verður til viðmerkingarnar í álitinum í tingmáli nr. 81/1992: Løgtingslóg um stuðul til feskfiskaflotan.

# 33. Lántøkuloyvi til kommunurnar í Vágum

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Landsstýrinum verður álagt at loyva kommununum í Vágum at taka kr. 6 mió. í láni sum stovnsfæ til *Commercial Viking Foundation.*

**Viðmerkingar:**

Commercial Viking Foundation hevur gjørt eitt rúgvusmikið og drúgt arbeiði at kanna møguleikarnar fyri framleiðslu av elektroniskum komponentum í Føroyum.

Stovnararnir eru tveir dynamiskir menn. Annar útbúgvin radiomekanikari, veikstreymsverkfrøðingur, roknskaparútbúgving á høgum støði, framleiðsla og maskinteknikkur, leiðslutænasta og psykologi v.m.

Hin útbúgvin elektromekanikari, ídnaðarbúskapur og framleiðsla, teknonomskeið og góðskustýring.

Báðir hava teir drúgvar royndir í Danmark.

Afturvendandi spurningurin er og hevur verið, um Føroyar við síni fjarstøðu er kappingarført sum ídnaðarland.

Vanligt er, siga teir, at flutningskostnaðurin av rávørum til eitt virki og flutningur av framleiðsluni á marknaðin ikki mugu verða omanfyri 2% av marknaðarprísinum.

Í hesum føri verður hann 1,45%.

Commercial Viking Foundation byrjar við elektroniskum ídnaði, men annars skal Commercial Viking Foundation vera ein "banki" av vitan og "know-how" og harvið skapa iblástur til virkisfús fólk við góðum hugskotum.

Áðrenn viðkomandi fær stuðul frá C.V.F., fær hann autorisatión sum prógv um dugnaskap til tað, hann ætlar sær í holt við.

Fyri at fólk skulu kunna tora at seta virksemi á stovn, veitir stovnurin upp til 75% sum trygd.

Gongur sum ætlað, koma vit at fáa ein føltáttaðan ídnað kring landið, og tað er júst arbeiðspláss, vit hava brúk fyri, nú fólk í hópatali umhugsa at flyta av landinum.

Hvussu tað so enn fer at ganga við elektroniska ídnaðarvirkinum í Miðvági, so meta vit tað at vera eitt gott "pilotproject" til nýhugsan í føroyskum vinnulívi.

Menningarstovan og landsstýrið hava alt relevant tilfar hesum málinum viðvíkjandi.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 33/1992: Lántøkuloyvi til kommunurnar í Vágum.*

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 6.november 1992 og eftir 1. viðgerð 24. november 1992 beint í ídnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið. Tað er landsstýrið, sum í hvørjum einstøkum føri skal geva kommunum loyvi til lántøku. Landsstýrið hevur viðgjørt umsókn frá kommunum í Vágum um loyvi til lántøku til ta verkætlan, sum málið snýr seg um, og varð henda umsókn ikki gingin á møti. Málið má tí haldast at verða avgreitt av landsstýrinum, og tekur nevndin ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

# 34./1992: Fíggjarløgtingslóg 1993 (2. framløga)

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 34/1992: Fíggjarløgtingslóg 1993 (2. framløga).*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 7. november 1992 og eftir 1. viðgerð 17. november 1992 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið. Undir viðgerðini hevur nevndin hildið fund við.

Atla P. Dam, løgmann, og við landsstýrismenninar
Tummas Arabo,
Jóannes Eidesgaard,
Svend Aage Ellefsen og John Petersen.
Maritu Petersen,
Jógvan Sundstein,

Undir viðgerðini hevur nevndin eisini hildið fundir við umboð fyri vinnulívið og við partarnar á arbeiðsmarknaðinum.

**Fundir hava verið við:**

Bóndafelagið, Jarðarráðið og Mjólkarvirki Búnaðarmanna undir einum,
Føroya Fiskimannafelag,
Føroya Reiðarafelag,
Føroyar Arbeiðarafelag,
Føroya Arbeiðsgevarafelag, Føroya Handverksmeistarafelag undir einum,
Havbúnaðarfelagið og Samskipanarbólkurin hjá almennum starvsfólkum.

Undir viðgerðini hevur nevndin somuleiðis hildið fund við umboð fyri:

Peningastovnarnar,
Føroya Fiskasølu og ein serkønan í marknaðarspurningum, herundir serliga í EFTA og EF viðurskiftum.

Nevndin hevur eisini hildið fund við:

Leivur Harrysson, landsgrannskoðara,
Búskaparráðið og Toll- og Skattstova Føroya.

**Landsstýrið**

Á fundunum við landsstýrisfólkini hevur fíggjarnevndin lagt stóran dent á at lýsa tær einstøku greinarnar á fíggjarløgtingslógini, sum tey ávísu landsstýrisfólkini hava ábyrgd av, so nágreiniliga sum gjørligt. Á hesum fundum er hvør einstøk grein gjøgnumgingin og landsstýrisfólkini hava givið fíggjarnevndini meira útgreinaðar upplýsingar um tey einstøku rakstrarstøðini og hava svarað spurningum frá fíggjarnevndarlimunum.

**Landbúnaðurin**

Umboðini fyri landbúnaðin vístu á, at játtanin til royndarstøðina er skorin úr 4,7 mió. kr. niður í 2,0 mió. kr. og at spurningur um at leiga royndarstøðina út hevur verið frammi. Umboðini mæltu til, at vinnan sjálv við ávísari játtan upplýsti at feløgini høvdu tosað við landsstýrismannin í búnaðarmálum um henda spurning. Nevndin heldur, at landsstýrið eigur at umhugsa henda møguleika. Annars upplýstu umboðini, at útlitini hjá vinnuni eru døpur, og kemst hetta serliga av nýggja handilssáttmálanum við EF og MVG-skipanini, sum eisini fevnir um mjólk, kjøt og aðrar landbúnaðarúrdráttir.

**Føroya Fiskimannafelag**

Á fundinum við Føroya Fiskimannafelag segði Óli Jacobsen, fiskimannafelagsformaður, at hann hevði sent fíggjarnevnd løgtingsins skriv um støðuna og hugsanir felagsins viðvíkjandi fíggjarlógaruppskotinum fyri 1993. Formaðurin fyri fiskimannafelagið legði fram ávíst taltilfar og útrokningar í tilknýti til spurningin um avleiðingarnar, um stuðulin til fiskivinnuna fellur burtur. Formaðurin fyri fiskimannafelagið umrøddi tær avtalur, ið landsstýrið hevur gjørt við ávís EFTA-lond og víst á, at hesar fara at forða okkum í at stuðla nýggjum arbeiðsplássum, eitt nú innan fiskivinnuna.

**Føroya Reiðarafelag**

Umboðini fyri Føroya Reiðarafelag upplýstu, at árið 1992 hevur verið sera ringt fyri vinnuna. Nevndi, at í januar var verkfall, í februar ringt veður, og at prísirnir gjøgnum árið hava verið fallandi. Reiðarafelagið umrøddi játtanina til íløgustuðul á grein 16, sum er sett til 55 mió. kr., og helt felagið, at játtanin átti at verið 100 mió. kr. um árið í minst fimm ár. Mælti annars til, at kvotaskipan verður sett í verk, tá talan er um tosk, hýsu og upsa. Helt, at hetta vildi ført til, at nøkur skip verða tikin úr vinnuni.

**Føroya Arbeiðarafelag**

Formaðurin fyri Føroya Arbeiðarafelag, Ingeborg Vinther, helt ikki, at fyriliggjandi fíggjarlógaruppskot er realistiskt. Hon fanst at mannagongdini og vísti á, at viðgerð er farin fram í landsstýrinum og í løgtinginum, uttan at Føroya Arbeiðarafelag er spurt. Ingeborg Vinther handaði fíggjarnevndini ymiskt hagtalstilfar viðvíkjandi vikulønum, og sýndi hetta tilfar, at stórt fall hevur verið og framvegis er í vikulønunum hjá stórum parti av teimum tímaløntu. Formaðurin í Føroya Arbeiðarafelag spurdi at enda, hvussu fólk skulu yvirliva undir verandi og komandi umstøðum og segði, at fólk fara ikki at góðtaka, at lóggivið verður viðvíkjandi barnsburðarfarloyvi, sjúkradøgum og frítíðini.

**Føroya Arbeiðsgevarafelag**

Formaðurin í Føroya Arbeiðsgevarafelag, Oddfríður Gregersen, umrøddi arbeiðsloysið, støðuna hjá arbeiðsloysistryggingargrunninum og spurningin um arbeiðsskapandi tiltøk. Vísti á, at arbeiðsloysið er alsamt vaksandi og at útgjaldingarnar hjá arbeiðsloysistryggingargrunninum nú eru vorðnar størri enn inntøkurnar. Helt, at annaðhvørt eigur grunnurin at fáa størri inntøkur, ella má útgjaldsupphæddin lækkast. Viðvíkjandi arbeiðsskapandi tiltøkum vísti felagsformaðurin til arbeiðsbólkin viðvíkjandi arbeiðsskapandi tiltøkum, ið er samansettur av umboðum fyri løgtingins arbeiðaramálanevnd, landsstýrið og partarnar á arbeiðsmarknaðinum.

**Handverksvinnan**

Fundurin við Føroya Handverkarafelag og Føroya Handverksmeistarafelag var sum áður nevnt undir einum. Feløgini ynsktu mest av øllum at tosa um støðuna hjá Føroya Læruráð. Umboðini greiddu frá, at læruráðið seinastu 4 árini hevur verið ein sjálvstøðugur stovnur undir landsstýrinum, men at ætlan landsstýrisins nú er, at leggja læruráðið undir landsskúlafyrisitingina, og hetta merkir, at játtanin til stovnin, sum hevur verið undir grein 18: Vinnulív og arbeiðsmarknaðurin, nú er flutt undir grein 14: útbúgving og gransking.

Føroya Handverkarafelag beyð sær til at hýsa læruráðnum ókeypis í húsum felagsins, og eisini buðu feløgini sær til at gjalda lønina til eitt normerað, men ikki sett fulltrúastarv. Fíggjarnevndin mælir til, at landsstýrið umhugsar hesi tilboð við tí fyri eyga at skapa neyvari samstarv millum læruráðið og vinnuna og fyri at spara í almennu útreiðslunum. Nevndin mælir landsstýrinum til at umhugsa hendan møguleika.

**Havbúnaðarfelagið**

Formaðurin fyri Havbúnaðarfelagið, Absalon í Buð, greiddi frá, at støðan hjá alivinnuni er scra vánalig. Segði, at marknaðarprísurin fór nakað upp herfyri,

men at teir nú aftur eru komnir niður í móti 30 kr. kg., og at hetta m.a. kemst av innflutningi av nógvum laksi frá Chile til europeiska marknaðin. Upplýst varð, at framleiðsluprísurin fyri kg. er umleið 28/29 kr., og víðari segði hann, at útlit møguliga eru fyri, at prísurin í næstu framtíð fer at liggja um 35/36 kr. kg. Umboðið fyri Ilavbúnaðarfelagið greiddi annars frá einum ætlaðum samstarvi við alarar í Noreg, Hetlandi, Skotlandi og Írlandi við tí fyri eyga, at fáa størri ávirkan á marknaðin í Europa.

**Tey alment løntu**

Samskipanarbólkurin fyri almenn starvsfólk varð umboðaður av Hildur Patursson, formanni í Føroya Pedagogfelag, Jákup Danielsen, formanni í Starvsmannafelagnum og Katrin Thomsen, skrivara í Føroya Postfelag og Føroya Pedagogfelag.

Hesi gjørdu vart við, at fíggjarlógaruppskotið fyri 1993 eftir teirra tykki ikki er realistiskt. Serliga vístu tey á, at í uppskotinum er roknað við, at lønarútreiðslurnar hjá tí almenna skulu verða 90 - 100 mió. kr. minni. Vísandi til, at sáttmálarnir hjá teimum alment løntu ikki fara úr gildi fyrr enn 1. juni 1993, løgdu tey dent á, at tað tí er órealistiskt at rokna við hesum 90 - 100 mió. kr. Tey vístu annars á aðrar møguleikar heldur enn beinleiðis lønarlækking. Nevndu eitt nú hugskotið um ein lønarskatt, og annars vístu tey eisini til arbeiðið í arbeiðsbólkinum viðvíkjandi arbeiðsskapandi tiltøkum.

**Peningastovnarnir**

Umboðini fyri peningastovnarnar víst á trupulleikarnar hjá fiskivinnuni, kommununum, teimum privatu eins og tey umrøddu rentuspurningin og gjaldførisspurningin hjá peningastovnununm, tí almenna og samfelagnum sum heild.

Viðvíkjandi fiskivinnuni varð sagt, at støðan er so mikið álvarsom, at skipini valla klára raksturin og enn minni rentur og avdráttir. Peningastovnarnir gjørdu vart við, at um játtanin til fiskivinnuna á fíggjarløgtingslógini ikki verður hækkað, er stórur vandi fyri, at veiðiflotin liggur, áðrenn alt ov long tí er farin av tí nýggja árinum.

Peningastovnarnir vóru samdir um, at støðan hjá kommununum er vorðin so trupul og torfør at hava tamarhald á, at neyðugt er hjá landsstýrinum at fara út í sjálva stýringina. Eisini varð nomið við tey høgu kommunuskattaprosentini, sum fleiri kommunustýrir hava samtykt at galda fyri 1993.

Nevndin ásannar, at støðan hjá flestu kommunum er so álvarsom, at fleiri ikki koma at orka at bera tær stóru lánibyrðarnar, og heitir fíggjarnevndin tí á landsstýrið um at hava vakið eyga við hesum trupulleika og at finna útvegir fyri ábótum til tess at forða fyri, at kommunalskipanin ikki sindrast.

Peningastovnarnir ásanna, at støðan hjá teimum privatu húsarhaldunum eisini er vánalig. Teir vístu á, at skattatrýstið er økt og at meirvirðisgjaldið fer at tyngja

enn meira. Viðvíkjandi teimum, ið sita við nýggjum og dýrum húsum royna peningastovnarnir so vítt gjørligt at finna loysnir við at umleggja lán, har tað er møguligt. Annars spáddu teir um fleiri tvingsilssølur av sethúsum.

Umboðini fyri peningastovnarnar greiddu frá, at teir í løtuni hava sínámillum samráðingar um rentuspurningin. Um endamáli við samráðingunum varð sagt, at ætlanin var at lækka rentuna og varð ein rentulækking uppá 1 til 2% nevnd. Annars varð spurningurin um eina rentulækking tengdur at rentuskattaspurningínum.

**Føroya Fiskasøla**

Bjarti Mohr, stjóri á Føroya Fiskasølu, legði fyri við at greiða frá rávørustøðuni hjá ti traditionellu framleiðsluni í fiskiídnaðinum. Roknaði ikki við príshækking á teimum vanligu framleiðslunum og nevndi, at keypiorkan í keyparalondunum er vorðin minni, men væntaði tó prísvøkstur á góðskaðum vørum og metti at prísurin á laksi fer at liggja um 34/36 kr. kg. Kom inn á spurningin um at keypa frystan fisk til tilvirkan í Føroyum, og upplýsti, at her er keypskostnaður og flutningur sera kapitalkrevjandi, og tí er vánaliga gjaldførið í føroyska samfelagnum ein ávís forðing. At enda upplýsti Bjarti Mohr, at hann metir, at virðið av samlaða útflutninginum hjá Føroya Fiskasølu fyri 1992 fer at liggja um 1,5 - 1,6 mia. kr., meðan tølini í 1991 og 90 vóru ávikavist kr. 1,7 mia. kr. og kr. 1,9 mia.

**Marknaðarspurningurin**

Serfrøðingurin í marknaðarspurningum, Óli Samró, greiddi fíggjarnevndini frá undirskjali í EFTA-sáttmálanum, sum ásetir, at stuðulsskipan ikki skal vera kappingaravlagandi, ikki ger seg galdandi fyrr enn aftan á 1. januar 1995 og tískil onga ávirkan fáa fyri stuðulsveitingarnar í 1993 og 1994. Viðvíkjandi spurningínum um at stuðla fiskivinnuni samstundis, sum vit hava fingið nýggjan handilssáttmála við EF og fleiri EFTA-lond, segði marknaðarserfrøðingurin, at støðan 1. januar 1993 ikki er øðrvísi enn støðan 1. januar 1992. Hann legði dent á, at vit harvið hava ein skáa í 1993 og 1994.

Óli Samró mælti annars til at knýta tættari samband við EF-marknaðin og helt, at hetta t.d. kundi verða gjørt við at skipa eina føroyska umboðsstovu í Brüxelles, ella við at keypa vitan og umboðan frá serkønum, ið hava skipað seg har á staðnum.

**Inntøkumetingin**

Í endanum av viðgerðini hevur fíggjarnevndin aftur hildið fund við Jógvan Sundstein, landsstýrismann í fíggjarmálum, landsbankastjóran, stjóran fyri Toll- og Skattstovu Føroya og stjóran fyri búskapardeildina í Tinganesi. Endamálið við hesum fundi var at lýsa inntøkusíðuna so neyvt sum gjørligt.

Á fundinum varð upplýst at inntøkumetingin á fíggjarlógaruppskotinum byggir á eina minking í virkseminum upp á 11% í 1993 sammett við 1992. Eisini varð sagt, at verður minkingin í virkseminum 1% hægri ella lægri, merkir hetta ávikavist eina minking í inntøkunum upp á 15 mió. kr. ella eina hækking upp á 15 mió. kr.

Á fundinum varð yrkiskt taltilfar viðvíkjandi inntøkusíðuni framlagt. Búskaparfrøðingarnir vóru samdir um, at støddin á minkingini í virkseminum er altavgerandi fyri, um tær mettu inntøkumar fara at halda. Verður minking tey 11 prosentini, sum roknað er við, skuldu metingarnar av inntøkum hildið.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta - Vilhelm Johannesen, Dan Petersen, Anfinn Kallsberg og Birgir Danielsen - og tríggjar minnilutar - Finnbogi Arge, Finnbogi Ísakson og Asbjørn Joensen.

**Viðmerkingar frá meirilutanum (Vilhelm Johannesen, Dan Petersen, Anfinn Kallsberg og Birgir Danielsen):**

Undir viðgerðini hevur nevndin lagt stóran dent á at fáa eina realistiska fíggjarlóg, sum í minsta lagi hevur javnvág og helst eitt avlop. Av tí, at inntøkusíðan er óviss, við tað at so stór óvissa ræður viðvíkjandi virkseminum í samfelagnum, sum víst er á framman fyri, er sera avgerandi fyri inntøkumar, mælir meirilutin til at gera nakrar fleiri sparingar.

Í fyriliggjandi fíggjarlógaruppskoti er roknað við einari lønarsparing upp á umleið 96 mió. kr. Uppskot, ið longu eru løgd fyri tingið, koma at minka um almennu lønirnar við umleið 24 mió. kr. Landsstýrið hevur sent uppsøgn við nýggjum krøvum og uppskotum við øll tey fakfeløg, sum hava sáttmála við tað almenna. Tað er av stórum týdningi, at úrslit spyrst burtur úr hesum samráðinum so tíðliga í árinum sum gjørligt, so talið av uppsøgnum verður avmarkað mest møguligt.

Undir grein 19 nýtt rakstrarstað: Inntøkutrygd hjá fiskimonnum mælir meirilutin til at hækka játtanina við 2,8 mió. kr. Nærri verður greitt frá hesum undir viðmerkingunum til grein 19. Men við tað, at hesar 2,8 mió. kr. eru skattskyldugar, mælir meirilutin til at hækka grein 1, rakstrarstað 1201 vanligur inntøkuskattur við 1 mió. kr.

Vísandi til løgtingsmál nr. 57/1992: Uppskot til "Lov um ændring af forskellige love for Færøerne om sociale ydelser" nælir meirilutin til, at rakstrarstað 8005 undir grein 8: Afturgjald verður hækkað við 9 mió. kr. og sett til 244 mió. kr. í staðin fyri 235 mió. kr. á landstýrisins uppskoti.

Viðvíkjandi grein 10, rakstrarstað 10106 Løgtingsbygningur hevur landsstýrið lækkað játtanina við 200.000 kr. Tá hetta eru fastar útreiðslur til vask, telefon, el og hita, bæði í tinghúsinum og á gamla apotekinum verður mælt til, at seta upphæddina til tað sama, sum játtanin í 1992 kr. 605.000.

Viðvíkjandi grein 10, rakstrarstað 11991 Norðurlanda Ráðið og grein 11, rakstrarstað 11557 Norðurlendsk samvinna, mælir nevndin til, at stuðulin frá Norðurlandaráðnum til Føroyar verður at góðskriva við einari helvt til hvørt rakstrarstaðið.

Á fíggjarlógaruppskotinum hevur landsstýrið undir heitinum "Menning av fíggjarstýringsskipan" skotið upp at játta 2 mió. kr. Meirilutin tekur undir við hesi ætlan landsstýrisins, men heldur, at henda játtan kann toyggjast yvir tvey ár og mælir tí til, at játtanin fyri 1993 verður sett til 1 mió. kr.

Viðvíkjandi grein 11 landsfyrisiting hevur meirilutin ikki nógv at viðmerkja, men vil mæla til, at uppskotna játtanin á rakstrarstaði 11851: Ognin Tinganes, sum er 2,2 mió. kr., verður lækkað við 700.000 kr. og sett til 1,5 mió. kr.

Viðvíkjandi grein 12 ger meirilutin vart við, at útreiðslumar í krónum eru lækkaðar munandi seinastu árni, men at lutfalsligu sparingarnar hava verið minni enn á fíggjarlógini annars, hetta hóast útreiðslurnar á uppskotinum fyri 1993 fevna um eina lønarlækking upp á 10%.

Niðanfyri standandi yvirlit yvir roknskapirnar fyri fíggjarárini 1989, 1990, 1991 og endurskoðaðu fíggjarlógini fyri 1992 og uppskotnu játtanina fyri 1993 sýna greitt, hvussu gongdin hevur verið, tá talan er um játtanir til grein 12 Heilsumál.

| | **R1989** | **RI990** | **R1991** | **End. 1992** | **J1993** |
|---|---|---|---|---|---|
| mió. kr. | 411 | 339 | 381 | 374 | 346 |
| % av útreiðsl. | 12,3 | 11,0 | 11,3 | 12,7 | 12,9 |

Nógv tann størsti parturin av játtanini á grein 12 (84,3%) fer til tey 4 sjúkrahúsini (Ríkissjúkrahúsið íroknað). Hetta er eisini ein av teim mest umrøddu útreiðslunum á fíggjarlógini. Undir núverandi fortreytum hava sparingar í stóran mun verið gjørdar seinastu árini. Úrslitið er, at lønirnar á teimum trimum føroysku sjúkrahúsunum nú eru meira enn 80% av øllum útreiðslunum. Við verandi bygnaði kunnu framhaldndi sparingar bert fara fram við lægri lønarútreiðslum og møguligum uppsøgnum.

Tekniska menningin innan sjúkrahúsøkið er stór, so skulu vit fylgja við, er uttan iva neyðugt við fløgum í nýggj amboð eins og roknast má við, at raksturin av hesum kann koma at kosta pening. Seinastu nógvu árini hevur bygnaðurin í menningini av sjúkrahúsinum verið nógv umrøddur, uttan at sigast kann, at politisk semja er um hetta. Í hesum sambandi eigur at verða víst á ta arbeiði, sum ráðleggingarnevndin hevur gjørt. Serstakliga eiga vit at hugsa um:

1) "Betænkning vedrørende udbygning af sygehusvæsenet på Færøerne" fra 1. august 1990, sum gjøgnum ríkisumboðsmannin er sent til "Indenrigsmini-

steriet", sum so aftur ígjøgnum "Sundhedsstyrelsen" hevur latið landsstýrinum eitt álit, dagfest 8. februar 1982 og

2) Áliti frá "Dansk sygehusinstitutt", dagfest 1. mars 1988, eisini umbiðið av ráðleggingarnevndini. Endalig niðurstøða, bygd á tað, sum er sagt undir 1) og 2) omanfyri, eins og annað týdningarmikið tilfar, er ongantíð gjørd.

Landsstýrismaðurin í heilsumálum, Jóannes Eidesgaard, hevur á fundi í fíggjarnevndini upplýst, at hann á fundi við danska heilsumálaráðharran í desember 1992 hevur gjørt avtalu um neyðuga serkøna hjálp frá donsku heilsumyndugleikunum við tí fyri eyga at finna fram til ta røttu menningarætlanina fyri tað samlaða sjúkrahúsverkið. Fyrsti fundur skal verða longu í byrjanini av januar 1993. Hesi ætlan tekur meirilutin undir við.

Viðvíkjandi rakstrarstaði 12012: Hjálpitólarmiðstøð, har játtanin eftir uppskoti landsstýrisins er 2.222.000 kr., mælir meirilutin til, at landsstýrið kannar møguleikan fyri at spara ein part av hesi játtan við at leggja virksemið hjá miðstøðini inn á sjúkrahúsini og møguliga eisini ellis- og røktarheimini.

Viðvíkjandi viðgerð av rúsdrekkamisnýtarum so eru 6,9 mió. kr. skotnar upp á grein 12. Ætlanin er, at henda játtan skal nýtast til viðgerð á bæði Blákrossheiminum og Heilbrigdinum. Í 1992 var játtanin til Blákrossheimið 4.167.000 kr. og til Heilbrigdið 4,8 mió. kr. Hetta merkir, at uppskotna játtanin fyri 1993 er 2.067.000 kr. lægri enn í 1992. Orsøkin til hetta er ætlaða samskipanin, soleiðis at øll avrúsing skal fara fram á Landssjúkrahúsinum, meðan eftirviðgerðin skal fara fram uttanfyri sjúkrahúsverkið.

Hetta er mett at verða bæði bíligari og betri og meirilutin roknar við, at hetta verður gjørt innan játtanarkarmin hjá Landssjúkrahúsinum. Í hesum sambandi skal verða gjørt vart við, at báðir stovnarnir við somu grundgeving hava sagt seg vera hart í móti hesi samskipanarætlan.

Eisini skal verða víst á, at í álitinum til nýggju rúsdrekkalógina hevur samgonguminnilutin víst á: "at tað almenna her og nú eigur at sýna viðgerðar- og eftirviðgerðar spurninginum nógv størri ans, enn gjørt hevur verið higartil. Hetta merkir so aftur, at løgtingið eigur at játta størri upphæddir."

Tí setir meirilutin fram soljóðandi:

**I Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Um neyðugt, verður álagt landsstýrinum, tá samskipanarætlanin av rúsdrekkamisnýtarum verður gjørd, at játta upp til 2 mió. kr. til endamálið. Um peningurin ikki er tøkur, verða prísimir á rúsdrekka hækkaðir, soleiðis, at hetta endamálið verður rokkið.

Viðvíkjandi grein 13: Samferðslumál vísir meirilutin á, at játtanin til Strandfaraskip Landsins er sett til 23 mió. kr. Á eykafíggjarlógini fyri 1992 er játtanin 46 mió. kr. Rakstrarúrslitið í 1991 var 48,3 mió. kr. í halli. Í viðmerkingunum verður sagt, at "Smyril" og lastbilarnir, sum sambært roknskapin fyri 1990 kostaðu 10,2 mió. kr. pluss pakkhús við meira umleið 3 mió. kr. og í 1991 12 mió. kr., skulu takast burtur úr roknskapinum og leggjast í tvey sjálvstøðugu almenn partafeløg soleiðis, at hesi ikki tyngja landskassaroknskapin.

Hetta kann bert lata seg gera, um ognirnar kunnu nýtast sum trygd fyri partapeninginum og fyri rakstrarkredittinum, og tað vil siga, at í ringasta føri mugu kredittveitandi peningastovnar selja ognirnar, um undirskot verður, og um fulnaður ikki er fyri skuldini á annan hátt, t.d. við at landskassin stendur aftanfyri.

Síðani eru umleið 10 mió. kr. eftir, ið skulu fáast til vega við sparingum og rationaliseringum av tí rakstri, sum tá er eftir. Hetta eru stór mál at seta sær. Men meirilutin er samdur í, at tey eiga at verða roynd.

Undir grein 13 rakstrarstað 13018 Nýggir vegir og brýr hevur landsstýrið skotið upp at seta av 24 mió. kr., og undir rakstrarstað 13061 Berghols- og brúgvagerð 26 mió. kr. ella samanlagt 50 mió. kr. Meirilutin mælir til, at játtanin til fløgur undir grein 13 verður lækkað við 6 mió. kr., og setir fram uppskot samsvarandi hesum. Av eftirverandi játtanini kann í mesta lagi 1 mió. kr. nýtast til kanningar í sambandi við møguliga gerð av tunnli undir Vestmannasund.

(Vart verður gjørt við, at Birgir Danielsen tekur fyrivarni hesum viðvíkjandi).

Viðvíkjandi grein 14 Útbúgving og gransking. Á fíggjarlógarupspkoti landsstýrisins er eingin játtan til skúlabarnaflutning. Á galdandi fíggjarlóg er játtanin 2,5 mió. kr. Meirilutin heldur, at 1,5 mió. kr. eigur at setast av í 1993, serstakliga at nýta til flutning av skúlabørnum sum ganga í skúla uttanfyri teirra egnu bústaðarkommunu. Meirilutin ger vart við, at henda játtan er treytað av, at grein 34 í løgtingslógini um fólkaskúlan verður broytt.

Viðvíkjandi rakstrarstað 14661, ið er fiskiídnaðarskúli í Norðstreymoy, og rakstrarstað 14397, sum er fiskivinnuútbúgvingar í Norðoyardeplinum, ger meirilutin vart við, at útgreiningin av játtanini er treytað av, at løgtingslóg nr. 62 frá 6. juni 1988 um ávísar skúlar verður broytt samsvarandi frammanfyri nevndu útgreining. Meirilutin mælir til, at viðmerking hesum viðvíkjandi verður sett undir nevndu grein á fíggjarlógini.

Avlop av stuðuli til fiskivinnuna fíggjarárinum 1992, verður at flyta til sama rakstrarstað fíggjarárið 1993.

| **Grein 17** | **Landbúnaður Landbrug** | **R 1991** | **J 1992** | **Endursk. 1992** | **J 1993** |
|---|---|---|---|---|---|
| 17015 | Landsdjóralækna-embætið Landsdyrlægeemb. | 3552 | 3351 | 3332 | 3120 |
| 17029 | Djóralæknatænastan Dyrelægetjeneste | | | | |
| 17034 | Fiskasjúkutænastan Fiskesygetjeneste | | | | |
| 17048 | Landbúnaðarráðgev. Landbrugskonsulent | 245 | 417 | 414 | 0 |
| 17205 | Royndarstøðin Forsøgsstationen | 4683 | 4697 | 3668 | 2000 |
| 17219 | Avloys.sk.f.mjólka-framl. Ferieordn. for mælke-prod. | 580 | 580 | 580 | 0 |
| 17307 | Skógrkt landsins Landets skovæsen | 1403 | 1492 | 1483 | 1400 |
| 17409 | Fuglakanningarst. v.m. Ornitologisk stat. m.v. | 213 | 350 | 350 | 350 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 17502 | Stuðul til ullavasking | | | | |
| | Støtte til uldvask | | 800 | 600 | 600 |
| 17901 | Aðrir studningar | | | | |
| | Andre tilskud | | | | |
| 343013 | Húsdjóraaling | | | | |
| | Husdyre opdr. | 154 | 154 | 154 | 0 |
| | **Landbúnaðarstudn.:** | | | | |
| | **Landbrugstilskud:** | | 20100 | 19300 | 19000 |
| | Nýdyrking | | | | |
| | Nyopdyrkning | 2500 | | | |
| | Studn. t. ílegg. landb. | | | | |
| | Fin.tilskud. til landb. | 3500 | | | |
| | Studn. til mjólkarframl. | | | | |
| | Tilsk. til mælkeprod. | 12500 | | | |
| | Studn. til súrh.brunnar | | | | |
| | Tilskud til græssiloer | 300 | | | |
| | Stráfóðurstudningur | | | | |
| | Tilskud til stråfoder | 1295 | | | |
| 343038 | Rentustudn. t. landbúnaðarlán | | | | |
| | Rentetilsk. til landbrugslån | 1000 | 1000 | 1000 | 0 |
| 343087 | Skeiðvirksemi | | | | |
| | Kursusvirksomhed | 10 | 50 | 50 | 0 |
| 343117 | Vakstrarhús, studn. | | | | |
| | Drivhuse, tilskud | 800 | 400 | 400 | 0 |
| 343133 | Studningur til kjøt | | | | |
| | Tilskud til kød | 2800 | 2500 | 2500 | 2500 |
| 343308 | Bjargarøkt | | | | |
| | Pasning af fuglefjelde | 110 | 0 | 0 | 0 |
| | Stuðul til ull/ullaúrdr. | | | | |
| | Proj. vedr.bearb. af uld | 200 | 0 | 0 | 0 |
| 373305 | Landsst. at ráða yvir | | | | |
| | Landsstyret at råde over | 78 | 80 | 80 | 60 |
| | Færri lønarútreiðslur: | | | | |
| | Lønreduktioner | | | | -500 |
| **Rakstur** | | | **35923** | **35971** | **33911** | **28530** |

| Grein 18 | Vinnulív og arb. markn. annars | R 1991 | J 1992 | Endursk. 1992 | J 1993 |
|---|---|---|---|---|---|
| 18109 | Arbeiðseftirlit | | | | |
| | Arbejdstilsyn | 3633 | 3643 | 3616 | 3000 |
| 18152 | Brandvenjingarstøð við Áir | | | | |
| | Brandtræningsskolen ved Áir | 250 | 200 | 200 | 200 |
| 18166 | Brunaumsjón Lands. | | | | |
| | Brandsikkerhedstils. | 487 | 510 | 510 | 510 |
| 18202 | Bileftirlit | | | | |
| | Biltilsyn | 1886 | 500 | 473 | 300 |
| 18216 | Radioeftirlit | | | | |
| | Radiotilsyn | 259 | 255 | 255 | 284 |
| 18235 | Ráðið fyri ferðslutr. | | | | |
| | Rådet for færdselss. | 961 | 961 | 954 | 960 |
| 18268 | Filmseftirlitið | | | | |
| | Filmtilsynet | 336 | 330 | 327 | 330 |
| 18318 | Semingsmannaskipan | | | | |
| | Forligsinstitution | 150 | 160 | 160 | 160 |
| 18323 | Studn. til kolagrevstur | | | | |
| | Tilsk. til kulminedrift | 635 | 400 | 400 | 400 |
| 18342 | Skeiðvirksemið | | | | |
| | Kursusvirksomhed | 20 | 50 | 50 | 50 |
| 18356 | Ferðamannamiðstøðin | | | | |
| | Turistcentralen | 3046 | 2984 | 2969 | 4000 |
| 18361 | Menningarstovan | | | | |
| | Kont. f. industr. udvikl. | 1903 | 2703 | 2686 | 2418 |
| 18406 | Sjómansheim | | | | |
| | Sømandshjem | 300 | 300 | 300 | 0 |
| 18508 | Vestnordenprosj. | | | | |
| | Vestnordensproj. | 100 | 100 | 100 | 100 |
| 18513 | Menningargr. útn. | | | | |
| | Vestnordenfonden | 56 | 45 | 45 | 100 |
| 18527 | Menningargr. ídn. | | | | |
| | Til Udviklingsfond | 15000 | 12000 | 57988 | 20000 |
| 18532 | Stuðul til ídnaðarfr. endamál | | | | |
| | Støtte til industrifr. formål | 5100 | 8100 | 1600 | 3000 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Farmafl.endurgjald | | | | |
| | Fragtrefusion | | 4700 | 2900 | 400 |
| | Tollendurgjald | | | | |
| | Toldrefusion | | 15000 | 10700 | 1100 |
| | Rentustudningur | | | | |
| | Rentetilskud | | 14500 | 7200 | 6600 |
| | Vørum. og innfl. | | | | |
| | av fiski | | | | 23000 |
| | Sáttmálaeftirlit | | | | 150 |
| 18601 | Heilsufrøðilig starvsst. | | | | |
| | Hygiejnisk laborat. | 5189 | 5450 | 5406 | 5400 |
| | Góðskueftirlit | | | | |
| | Fiskekvalitetskontr. | 2232 | 2150 | 2131 | 2150 |
| 18653 | Orkuráðið | | | | |
| | Energirådet | 584 | 450 | 447 | 400 |
| 18667 | Orkur., kanningarvirks. | | | | |
| | Energiråd., undersøg. | 23 | 550 | 550 | 500 |
| 186xx | Kanningar vm. í samb. v.undirgr. | | | | |
| | Unders. vedr. undergr. | | | | 1500 |
| 18703 | Tiltøk fyri ung | | | | |
| | Tiltag for unge | | | 4400 | 5000 |
| 18365 | Javnstøðunevndin | | | | |
| | Ligestillingsudvalget | 194 | 200 | 200 | 170 |
| 18546 | Stuðul t. Gistingarhús-grunnin | | | | |
| | Tilskud t. Hotellånef. | 1000 | 1000 | 0 | 0 |
| | Oljuvinna, kanningar | | | | |
| | Oljeudv., undersøgelser | | 500 | 500 | 500 |
| 373305 | Landsst. at ráða yvir | | | | |
| | Landsst. at råde over | 120 | 130 | 130 | 130 |
| | Færri lønarútreiðslur: | | | | |
| | Lønreduktioner | | | | -2000 |
| **Rakstur** | | **43464** | **77871** | **107197** | **80812** |
| | Stuð.t. umhvørvis-verndartiltøk | | | | |
| | Tilskud t. miljøbesk. projekt | | 300 | 300 | 2100 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Hálkubr., Bileftirl., nýb. | | | | |
| | Øvelseskørebane, Bil- | | | | |
| | tilsyn, nyb. | 0 | 1500 | 0 | 0 |
| | Bileftirlitið, sýningarh. | | | | |
| | Biltilsyn, kontrolst. | 200 | 0 | 0 | 0 |
| | Ferðam.miðst.Kristna- | | | | |
| | stova,umb. | | | | |
| | Turistcentr., Kristna- | | | | |
| | stova, omb. | 499 | 400 | 400 | 0 |
| 15806 | Heilsufr. Starvsst., nýb. | | | | |
| | Hygiejn. laborat., nyb. | 354 | 1000 | 1000 | 1000 |
| **Íløgur** | | **1053** | **3200** | **1700** | **3100** |
| | | **44517** | **81071** | **108897** | **83912** |

| **Grein 19** | **Almannamál v.m.** | | | **Endursk.** | |
|---|---|---|---|---|---|
| | **Socialvæsen m.v.** | **R 1991** | **J 1992** | **1992** | **J 1993** |
| 19042 | Andveikrav., búst. | | | | |
| | Åndsvagefors., bol. | 33546 | 36720 | 35866 | 33800 |
| 19056 | Fólkapensjón | | | | |
| | Folkepension | 228505 | 233400 | 233400 | 226700 |
| 19075 | Røktarheim | | | | |
| | Plejehjem | 79210 | 81000 | 79928 | 68000 |
| 19089 | Vistarh. fyri pension. | | | | |
| | Bolig. for pensionist. | 5994 | 5949 | 5701 | 5505 |
| 19094 | Serviðb. t. ávísar | | | | |
| | pensiónistar | | | | |
| | Særtillg til pensionister | 3 | | 0 | |
| 19106 | Avlamispensión | | | | |
| | Invalidepension | 92015 | 92000 | 92000 | 107800 |
| 19208 | Einkjubarnastyrkur | | | | |
| | Børnebid. til enlige | | | | |
| | forsørg. | 4586 | 3840 | 3590 | 3590 |
| 19301 | Einkjupensjón | | | | |
| | Enkepension | 983 | 1070 | 920 | 920 |
| 19403 | Vanlig forsorg | | | | |
| | Almindelig forsorg | 84293 | 50000 | 95600 | 66000 |
| 19407 | Ymiskir forsorgarst. | | | | |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Forsk. forsorgsinst. | 14168 | 14806 | 14100 | 9700 |
| 19519 | Uppískoytisveiting | | | | |
| | Tillægssydelse | 587 | 820 | 670 | 400 |
| 19557 | Barnaforsorg | | | | |
| | Børneforsorg | 15642 | 14202 | 12620 | 13700 |
| 19607 | Heimarøktarskip. | | | | |
| | Hjemmeplejeordn. | 46086 | 49895 | 47469 | 57420 |
| | Vardar íbúðir, stuð. t. rakstur | | | | |
| | Besk. bol., dr.tilsk. | | 200 | 200 | 300 |
| 19631 | Dagstovnar | | | | |
| | Daginstitutioner | 47513 | 52347 | 49518 | 48016 |
| 19659 | Dagpeningaskip. | | | | |
| | Dagpengeordning | 65288 | 66000 | 53500 | 41500 |
| 19664 | Bjálv., hús hjá pensionistum | | | | |
| | Isol. af pensionistb. | 2000 | 2000 | 2000 | 2000 |
| 19678 | Brennistudn. til pensionistar | | | | |
| | Brændselstilskud til pensionister | 6558 | 6500 | 6500 | 6500 |
| 19683 | Barnastyrkur | | | | |
| | Børnetilskud | 12015 | 12000 | 12000 | 0 |
| 19697 | Sams.f. ans.eldri og óhj.heima | | | | |
| | Vederl.for at passe ældre hj. | 7342 | 8300 | 7400 | 7300 |
| 19868 | Før. á stovni í Danm. | | | | |
| | Fær.på danske inst. | 20254 | 16750 | 16750 | 21400 |
| | Kærun. og umsiting | | | | |
| | Anken. og administr. | | | | 400 |
| 19892 | Vanlukkutrygg.ráðið | | | | |
| | Ulykkeforsikringsr. | 538 | 500 | 500 | 500 |
| | Inntøkutr. hjá fiskim. | | | | 74000 |
| 19904 | Ymsir studningar | | | | |
| | Forskellige tilskud | | | | |
| 363382 | Møðrahjálp | | | | |
| | Mødrehjælp | 0 | 200 | 200 | |
| 363399 | Kreppumiðstøð | | | | |
| | Krisecenter | 100 | 200 | 200 | 400 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 363557 | Hús hjá deyvafel.<br>Døves foreningshus | 560 | 560 | 560 | 560 |
| 363565 | Blindaheimið<br>Blindehjemmet | 3800 | 4000 | 3973 | 4000 |
| 363598 | Fráhaldsf.Blákrossst.<br>Afholdningsfor. Blákr. | 120 | 120 | 120 | 100 |
| 363603 | Styrkveiting<br>Understøttelse | 69 | 150 | 150 | 150 |
| 363628 | ALV<br>ALV | 350 | 350 | 350 | 350 |
| 363636 | Fráhaldsfeløg<br>Afholdsforeninger | 450 | 450 | 450 | 450 |
| 363644 | Reyði Krossur<br>Røde Kors | 30 | 30 | 30 | 30 |
| 363652 | Hjálpargr. f. óarb. førar fiskim.<br>Fond. f. uarbejdsd. fisk. | 352 | 400 | 400 | 400 |
| 363669 | Feløg teirra brekaðu<br>Foren. handikappede | 880 | 880 | 880 | 880 |
| 363707 | Arbeiðsl.gr. arbeiðara-felags<br>Arbejderf. arbejdsløs-hedsf. | 500 | 0 | 0 | 0 |
| 363797 | Ráðg. f. før. Danm.<br>Rådg. f. fær. i Danm. | 445 | 460 | 460 | 460 |
| 363819 | Búst. fyri sinnisbr.<br>Institutioner for sindsl. | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 363827 | Hjálpargr.móti alkoli, misnýtslu<br>Hjælpefond mod alkoholmisbrug | 6 | 1200 | 700 | 1000 |
| 363851 | Landsf. pensionist.<br>Pensionisternes landsf. | 150 | 200 | 200 | 200 |
| 333104 | Trygdargr. f. avreið. og lønir<br>Lønmodt. garantifond | 808 | 650 | 650 | 550 |
| 373305 | Landsst. at ráða yvir<br>Landsst. at råde over | 541 | 200 | 200 | 300 |
| **Rakstur** | | **776287** | **758349** | **779755** | **805281** |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Vardar íbúðir, Vágur | | | | |
| Besk. pensionistb., Vágur | 1600 | | | 360 |
| Bústovnar, serforsorg | | | | |
| Døgninstit., særfors. | 0 | 3000 | 407 | 0 |
| Dagh. Berjabr., nýb. | | | | |
| Daginst., Berjabrekka | 2397 | 4500 | 4500 | 8500 |
| Uml.heim og búst., Suðuroy | | | | |
| Døgninst., Suðuroy | 1500 | 1500 | 0 | 0 |
| Búst., Eysturoy, nýb. | | | | |
| Døgninstit. Eyst., nyb. | 2005 | 0 | 0 | 0 |
| Eysturoyar Røktarh. | | | | |
| Eysturoy Plejehjem | 981 | | | |
| Røktarh. Norðstr.,nýb. | | | | |
| Plejehj., Norðstr., nyb. | 1000 | 1000 | 0 | 0 |
| Ellish. í Havn, umb. Alderdomshjem, | | | | |
| Tórshavn, omb. | 400 | 0 | 0 | 0 |
| Sandoyar Ellis- og røktarheim | | | | |
| Sandoy alderd. og plejehjem | 12450 | 7800 | 6000 | 7656 |
| **Íløgur** | **22333** | **17800** | **10907** | **16516** |
| | **798620** | **776149** | **790662** | **821797** |

| | **Íbúðarmál** | **R 1991** | **J 1992** | **Endursk. 1992** | **J 1993** |
|---|---|---|---|---|---|
| 19956 | Húsalánsgrunnurin | | | | |
| | Boliglånefondet | 0 | 10000 | 5000 | 5000 |
| 19961 | Íbúðargrunnur | | | | |
| | Boligfond | 0 | 1000 | 1000 | 1000 |
| 19975 | Rentustudn. til húsab. | | | | |
| | Rentetilsk. t. husopsp. | 2003 | 1700 | 1700 | 2000 |
| **Rakstur** | | **2003** | **12700** | **7700** | **8000** |

| Grein 20 | Eftirlønarútr. Pensionsudg. | R 1991 | J 1992 | Endursk. 1992 | J 1993 |
|---|---|---|---|---|---|
| 20013 | Eftirlnøarútr. Pensionsudgifter | | | | |
| 103558 | Eftirlønir Pensioner | 777 | 840 | 840 | 840 |
| 103599 | Danskar eftirlønir Danske pensioner | | | | 250 |
| 103612 | Bíðipeningur Ventepenge | 4082 | 4400 | 4400 | 3100 |
| 103629 | Tænastum.eftirl. Tjenestemandspens. | 6366 | 6900 | 6900 | 7000 |
| | Færri útreiðslur: Mindreudgift | | | | -500 |
| **Rakstur** | | **11225** | **12140** | **12140** | **10690** |

| Grein 21 | Eff. veðhaldsb. Effekt. garant.forpl. | R 1991 | J 19921992 | Endursk. | J 1993 |
|---|---|---|---|---|---|
| 21019 | Effektivar vehaldsb. Effekt. garantiforpl. | 167202 | 80000 | 190000 | 150000 |

| Grein 22 | Rentuútr. Renteudg. | R 1991 | J 1992 | Endursk. 1992 | J 1993 |
|---|---|---|---|---|---|
| | Rentuútreiðslur Renteudgifter | 202150 | 220000 | 220000 | 315000 |
| | Rent. av bundn. uppsparing Rent. af bund. opsp. | 0 | 3000 | 3000 | 3000 |
| | | **202150** | **223000** | **223000** | **318000** |

| Grein 26 | Ymsar ognarútr. Div. Ejendomsudg. | R 1991 | J 1992 | Endursk. 1992 | J 1993 |
|---|---|---|---|---|---|
| 26305 | Ymsar ognarútr. Div. ejendomsudg. | 145 | 700 | 700 | 700 |

| Grein 27 | Reguleringar<br>Reguleringer | R 1991 | J 1992 | Endursk.<br>1992 | J 1993 |
|---|---|---|---|---|---|
| | Reguleringar 1992 | | | | |
| | Reguleringer 1992 | 20000 | 14000 | | |
| | Endurgj. t.alm.stovn. fyri MVG | | | | |
| | Momsref. til off. inst. | | | | 20000 |
| **27005** | | **20000** | **14000** | **0** | **20000** |

| Rakstrarroknsk.<br>Driftsregnsk. | Roknsk.<br>1991 | Játt.<br>1992 | Endursk.<br>1992 | Játt.<br>1993 |
|---|---|---|---|---|
| Inntøkur tilsamans<br>Indtægter ialt | 2658452 | 2795255 | 2695755 | 2689005 |
| Rakstr.útr. (-rentuútr. veðh. og upph.) | | | | |
| Dr.udg.excl. gar.forpl. og kond. | 2442754 | 2320849 | 2290552 | 2033200 |
| Rentuútreiðslur<br>Renteudgifter | 202150 | 223000 | 223000 | 318000 |
| Upphøgging og eff. veðhaldsútr.<br>Garantiforpl. og kondemn. | 268007 | 80000 | 190000 | 150000 |
| Íløguútr. tilsamans<br>Investeringsudg. ialt | 286548 | 285600 | 250757 | 184814 |
| Útr. tilsamans<br>Udgifter ialt | 3199459 | 2909449 | 2954309 | 2686014 |
| Úrslit av rakstri og íløgum<br>Resultat af drift og invest. | -541007 | -114194 | -258554 | 2991 |

**Gjaldførisroknsk.**
**Likviditetsbudget**

| Nýútlán<br>Nyudlån | | R 1991 | J 1992 | Endursk.<br>1992 | J 1993 |
|---|---|---|---|---|---|
| 333025 | St.lán t. fiski- og farmaskip | | | | |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | | Tilsk.lån t. fiske- og fragtskibe | 10000 | 5000 | 5000 | 5600 |
| | | Likvidit.lán,fiski- og farmask. | | | | |
| | | Likvidit.lån,fiske- og fragtsk. | | | | 11300 |
| 14953 | 313152 | Gr. til útbúgving, nettotlán | | | | |
| | | Uddannelsesfond, nettoudlån | 8000 | 8000 | 8000 | 8000 |
| | | Lán til heilsumiðst. | | | | |
| | | Lån til sundhedsc. | | 3000 | 3000 | 5000 |
| Nýútlán tils. | | | | | | |
| Nyudlån ialt | | | 18000 | 16000 | 16000 | 29900 |
| Avdr. av uttanlanda láni | | | | | | |
| Afdr. på udenlandske lån | | | 31400 | 105500 | 105500 | 175000 |
| Afturgj. av bundn. uppsp. | | | | | | |
| Tilbagebet. af bunden oppsp. | | | 0 | 95000 | 32000 | 32000 |
| Afturgj. av veksilsk. til Tjóðb. | | | | | | |
| Nedbr. af gæld t. Nationalb. | | | | 100000 | 100000 | 100000 |
| Avdr. av før. lánum | | | | | | |
| Afdr. på indenl. lån | | | | 28000 | 20000 | 73000 |
| Nýútl. og avdr., gjaldførisfrágongd | | | | | | |
| Nyudl. og afdr., likv. træk | | | 31400 | 328500 | 257500 | 380000 |
| Inngjald.av avdráttum, gjaldføristilg. | | | | | | |
| Indb. på lån, forøg. af likv. | | | 30800 | 39000 | 39000 | 30000 |
| Kapitalpostar tilsamans | | | | | | |
| Kapitalposter ialt | | | -18600 | -305500 | -234500 | -379900 |
| | | | **Roknsk. 1991** | **Játt. 1992** | **1992 Endursk.** | **Játt. 1993** |
| Broyting í gjaldføri, bruttolánitørvur | | | | | | |
| Ændr. i likv.., lånebehov | | | -559607 | -419694 | -493054 | -376909 |

**Viðmerkingar frá minnilutanum (Finnboga Arge):**

Fíggjarløgtingslógin fyri árið 1. januar - 31. december 1992 varð samtykt á Føroya Løgtingi tann 20. december í fjør. Tá varð ætlað, at fíggjarlógin skuldi hava eitt hall upp á 91 mió. kr. aftaná, at íløgur vóru framdar fyri 190 mió. kr.

Bert nakrar fáar mánaðir inn í nýggja árið gjørdist tað samgongutingmonnum greitt, at fíggjarlógin ikki fór at halda. Búskaparráðið segði bart út, at hallið fór at verða 400 mió. kr. heldur enn tær 91 mió. kr., sum samgongan hevði roknað við.

Endin varð so tann, at samgongan vrakaði fyrsta uppskotið og kom við nýggjari fíggjarlóg fyri 1992, tann sokallaða "endurskoðaða" fíggjarlógin.

Fyri at fáa hesa fíggjarlóg at hanga saman framdi samgongan sparingar og legði eykaskattir á okkara fólk. Hóast tiltøkini, metti samgongan, at tað ikki var møguligt at fáa "endurskoðaðu" fíggjarlógina at halda hallið niðri á sama støði, sum upprunaliga mett. Tær 91 mió. kr. vóru nú broyttar til eitt ætlað hall upp á 256 mió. kr.

Árið 1992 er nú næstan farið aftur um bak, og vit hava fingið eina eykafíggjarlóg. Endamálið við eykafíggjarlógini er at fáa lógarheimild til tær upphæddir, sum víkja frá fíggjarlógini, sum tingið áður hevur samtykt.

Høvuðsfrávikini eru hesi: Inntøkurnar eru 150 mió. kr. lægri enn upprunaliga mett, útreiðslurnar eru 128 mió. hægri og íløgurnar 367 mió. kr. hægri. Frávikið er sostatt 646 mió. - í mun til endurskoðaðu fíggjarlógina. Men frávikið í mun til upprunaligu fíggjarlógina er 811 mió. kr.

Tað ljóðar ótrúligt, at tað skal bera til at meta 811 mió. kr. skeivt á einari fíggjarlóg upp á 2700 mió. kr. Ein partur av frágreiðingini er kreppuinnskotið upp á 300 mió. kr. til Sjóvinnubankan og partapeningurin til Atlantsflog. Verður sæð burtur frá hesum tølum má ásannast, at fíggjarlógin hjá samgonguni fyri árið 1992 gjørdist skeiv við útvið hálvari milliard.

– – –

Tað er sera torført at smíða álítandi fíggjarlógir í broytingingar – ikki minst tá ið tað gongur so skjótt eftir hæli sum nú. Á útreiðslusíðuni eru tað serliga tey effektivu veðhaldini og rentuútreiðslurnar, sum ferð aftan á ferð verða mett heilt skeivt.

Á inntøkusíðuni hevur landsstýrið støðugt lyndi til at meta ov positivt um skattirnar og tollgjøldini. Í 1992 varð skeivmetingin av inntøkunum 250 mió. kr. svarandi til umleið 10% av samlaðu inntøkunum.

Inntøkur landskassans eru minkaðar á hvørjum ári síðani 1988, tá tær vóru 3086 mió. kr. Størsta lækkingin var í 1990, tá kornu 312 mió. kr. færri inn í mun til undanfarna ár. Í verandi ári er inntøkan sambært eykafíggjarlógina 2546 mió. kr. - ella 540 mió. kr. minni enn í 1988.

Við hesari gongd í huga, er tað sera áhugavert, at meirilutin í fíggjarnevndini metir, at inntøkurnar hjá landskassanum í komandi ári fara at hækkað við 152

mió. kr. í mun til tað, sum eykafíggjarlógin staðfestir sum tað rætta talið fyri 1992.

Hesin veruleiki sigur minnilutanum so mikið, at meirilutin í fíggjarnevndini ikki ivast í, at tey óhugnaligu mongu skatta- og tolltiltøkini, sum nú verða framd, fara at virka eftir ætlan, hóast skattatiltøkini í verandi ári ikki eydnaðust serliga væl.

Men ásannast má, at skattatiltøkini í 1992 als ikki standa mát við tey tiltøk, sum verða sett í verk fyri at fáa fíggjarlógina fyri 1993 at hanga saman. Nøkur av hesum tiltøkum skulu verða nevnd her. Talan er m.a. um at stytta frítíðina, lækka frítíðarprosentið, gera nýtslu av karensdøgum, dagpeningurin í samband við barnsburð hvørvur, brennioljugjaldið hækkar, meirvirðisgjald verður sett í gildi, arvaavgjald hækkar, skattur verður lagdur á pensionistar og hækkaður eykaskattur kemur eisini í gildi.

Um øll hesi tiltøk fara at geva 152 mió. meira enn í 1992 í inntøkum til landskassan ber sjálvsagt ikki til at siga. Ein lønarmiðurskurður, sum framvegis er ein fortreyt fyri, at fíggjarlógin fer at halda, ávirkar eisini skatta- og tollinntøkunar. Men minnilutin heldur, at royndirnar undanfarin ár eiga at siga okkum, at rættast er at undirmeta inntøkurnar heldur enn at royna at raka beint á málið.

Treytin hjá donsku stjórnini fyri at veita kreppuhjálp til Føroyar er tann, at fíggjarlógin heldur - eisini tá árið er farið. Vit mugu tí vera sera varnir við inntøkunum, tí tað eru sum oftast tær, sum svíkja, tað hava tær gjørt fimm tey seinastu árini.

Tey mongu tiltøkini hava minni virksemi og vaksandi arbeiðsloysi við sær. Stórur partur av fólkinum er longu so hart fyrispentur, at hann tolir ikki fleiri byrðar. Seinastu hagtølini vísa (10 dec.), at 2419 fólk fáa veitingar úr arbeiðsloysistryggingini, meðan 1287 gera nýtslu av skipanini fyri fiskivinnuna. Harumframt eru umleið 1500, sum søkja eftir starvi og sum fyrr ella seinni skulu hava hjálp.

Talan er sostatt longu nú um 5000 fólk, sum hava fullan ella partvísan tørv fyri veitingum. Neyvan er nakað at ivast í, at bankafólkini, sum hava mett arbeiðsloysið við árslok 1993 at liggja um 6000, verða á leið, kanska hava tey enntá undirmett støðuna.

Umframt skattatiltøkini, so má eisini roknast við, at gjaldføristørvurin rættiliga slær ígjøgnum í komandi ári. Útlit er fyri, at partur av feskfiskaflotanum verður lagdur í vár. Verjutollurin hjá heimaídnaðinum hvørvur í samband við óhepnu handilsavtaluni, sum landsstýrið hevur gjørt við EF. Støðan hevði sostatt versnað, sjálvt um einki skattatiltak varð framt.

Tann krónunøgdin, sum hvørt húski fer at hava til nýtslu, fer at minka katastrofalt. Minkar keypiorkan, so minkar innflutningurin. Og minkar innflutningurin enn meira, fara fleiri handils- og tænastuvirki at lata aftur. Soleiðis breiða teir

óndu ringarnir seg framvegis. Spurningurin er so, um botnurin fer undan sethúsamarknaðinum. Hetta kann henda, og verður tað úrslitið, so fáa bankarnir, ið longu einaferð hava fingið hjálp, ein nýggjan og ikki minni vandamiklan brotasjógv.

Annars eru fortreytirnar fyri inntøkunum hjá landskassanum ivasamar. Landsstýrið roknar við, at veiðan undir Føroyum verður 78.000 tons, men seinastu tølini benda á, at veiðan verður heldur minni, umleið 75.000 tons. Laksaprísurin verður av landsstýrinum settur til 38 kr. kg., men sambært fiskasølustjóranum verður meðalprísurin helst 34-36 kr. kg.

Sera ivasamt er, um rækjuprísurin fer at liggja um 17 kr. kg, sum landsstýrið metir, í ár hevur hann verið nógv lægri, stundum niðri á helvtini. Roknað verður við 20.000 tons av innkeyptum fiski, men knappa gjaldførið fer kanska at gera tonsatalið lægri. Eitt ovurstórt fiskarí í Barentshavinum kann trýsta prísin á toski niður og sostatt minka um gjaldføristørvin í samband við keyptan fisk. Men hetta fær sjálvsagt eisini negativar avleiðingar í søluliðinum.

Landsstýrið roknar við, at Fiskasølan útflytir fyri 1,8 mia. kr, men minnilutin vísir á, at Fiskasølan hevur endurskoðað hesi tøl og metir teirra útflutningsvirði at fara at liggja um 1,5 -1,6 mió. kr.

Landsstýrið metir merivirðisgjaldið at fara at geva 563 mió. minus tær 28 mió., sum nýtast skulu til endurgjald av innflutningsgjaldinum. Harumframt koma 157 mió. inn fyri punktgjøld. Toll-, nýtslu- og framleiðslugjøld verða tilsamans mett at geva 888 mió. kr. Hetta tal var í 1988 uppi á 1130 mió. og er minkað á hvørjum ári síðani. Sambært eykafíggjarlógina fyri 1992 fer greinin at geva 760 mió. kr. í verandi ári. Sostatt metir landsstýrið, at talan verður um eina inntøkuframgongd upp á 128 mió. kr. innan toll- og meirvirðisgjaldsøkið. Hesum ivast minnilutin stórliga í.

Minnilutin fer í samsvar við omanfyri nevnda at mæla til, at inntøkurnar á fíggjarlógini fyri 1993 verða settar lægri. Hetta er eisini í tráð við tað, sum limir í Búskaparráðnum vísa á. Hesir ráðgevarar landsstýrisins ávara um, at skattainntøkurnar kunnu fara at minka við meira enn teimum 11%, sum landsstýrið gongur út frá, 15% hevur verið nevnt sum eitt dømi.

---

Støðan hjá kommununum kann fara at avlaga fíggjarlógina fyri 1993. Hjá fleiri kommunum er so illa vorðið, at umleið helvtin av skattainntøkuni fer til at gjalda rentur. Fallandi skattainntøkur kunnu lættliga hava við sær, at kommunurnar mugu geva skarvin yvir. Spurningurin er so, í hvønn mun landsstýrið noyðist at taka skuldin upp á seg. Hvannasunds-, Viðareiðis- og Skála kommuna hava akuttar trupulleikar, men støðan er sera hættislig fyri fleiri størri kommunum, t.d. á Sandi, í Vági, á Tvøroyri, í Vestmanna, í Sørvági og í Miðvági. Enn tá Klaksvíkin kann koma í trupulleikar.

Kommunuskatturin í Miðvági er settur til 24%, og tað frættist, at aðrar kommunur hava í byggju at gera tað sama. Landsstýrið má tí áseta eitt hægstamark fyri skattaprosent hjá kommunum, tí annars fer alt av lagi. Væntast kann, at ávís fólkaflyting fer at fara fram úr teimum kommununum, sum hava ov høgt skattatrýst, ikki bert orsakað av lægri skattabyrðu aðrastaðni, men eisini tí, at tænastustøðið verður ov lágt hjá skuldarbundnu kommununum. Verður fráflytingin veruleiki, tyngist skattabyrðan enn meira fyri tey, sum verða eftir. Tey kommunalu lánini eru fyri ein stóran part fíggjað í føroyskum peningastovnum og hjá Tryggingini, so vit kunnu lættliga ímynda okkum, hvussu støðan hjá lánsveitarunum fer at verða.

Minnilutin heldur, at tað í størst møguligan mun eigur at verða skorið niður á útreiðslusíðini á fíggjarlógini heldur enn at skrúva skattaprosentið upp. Minnilutin ásannar, at landsstýrið í ein vissan mun hevur skorið rakstrarútreiðslurnar niður, men heldur, at íløgurnar til óproduktiv endamál framvegis eru ov stórar, sum búskaparstøðan er. Landskassin orkar ikki at bera ein rakstur, sum kostar 2,5 milliardir um árið. Minnilutin heldur, at landsstýrið eigur at seta sær sum mál at lækka rakstrarútreiðslurnar stigvíst soleiðis, at við koma niður á eitt støði, sum liggur um 2 milliardir um nøkur ár. Hetta verður torført, men tá ið inntøkurnar ikki eru til staðar, gerst ikki annað. Vit skulu eisini minnast til, at landskassans skuld økist framvegis í stórum lopum, og at als einki verður gjørt fyri at niðurrinda skuldina. Uttan avlop á fíggjarlógini verður torført at rinda skuldina aftur.

Fyri at koma niður á eitt útreiðslustøði, sum liggur um 2 mia. kr, verður neyðugt at skrúva tíðina aftur. Vit mugu endurskoða, um stovnar og tænastur, sum í áttatitalinum hava fingið rúmd á fíggjarlógini, framvegis eiga at verða har, nú inntøkurnar eru lækkaðar so nógv. Men givið er, at tað ikki ber til at skera yvir ein kamb, tí ein partur av teim nýggju tænastunum er neyðugur í nútíðarsamfelagnum. Men hóast fleiri av tænastunum verða varðveittar, so er ikki vist, at virksemið framvegis skal haldast á núverandi útreiðslustøði.Minnilutin metir tó, at stórar rakstrarsparingar verða at finna í almennum stovnum, sum í langt áramál hava staðið á fíggjarlógini og sum automatiskt fáa somu játtan ár eftir ár, uttan at nakar spyr, um virksemi stovnsins eigur at halda fram í óbroyttum líki.

Almennir stovnar, sum ikki eru á fíggjarlógini, av tí at teir fáa gjøld beinleiðis frá forbrúkaranum, liva eitt friðhalgað lív. Eingin kannar eftir, um útreiðslustøðið er í lagi, ella um gjøldini kundu verðið sett niður.Her liggur ein stór uppgáva og bíðar eftir landsstýrinum.

Tað er ein sannroynd, at er ein útreiðsla einaferð komin á fíggjarlógina, so er sera trupult at fáa hana burtur aftur. Vit uppliva í dag stórar strukturbroytingar í vinnulívinum, virkir og skip fara á húsagang og tey fáu, sum knógva víðari, halda fram í broyttum líki við færri starvsfólkum og færri útreiðslum. Tað er ikki óvanligt, at t.d. privat tænastuvirkir skera útreiðslurnar niður við einum triðingi

eila í helvt eftir stuttari tíð, tað noyðast tey einfalt fyri at yvirliva. Hesin dynamikkur og hesi tillagingarevnini eru als ikki til staðar hjá tí almenna sektorinum, tí fyri eitt alment virki verður tað ongantíð ein spurningur um at yvirliva. Skattaborgarin stendur altíð við endan, og hesin veruleiki ger, at tað er so torført at laga almennu útreiðslurnar eftir nýggjum umstøðum, sum t.d. tá ið inntøkur landskassans lækka í slíkan mun, sum vit hava upplivað her á landi seinastu 5 árini. Landsins leiðsla má tí støðugt seta spurningar og krøv til teir almennu stovnarnar fyri at fáa ein dynamikk inn í virksemið. Serliga eiga krøv at verða sett til stovnsleiðararnar, sum ikki eiga at sita í sama stóli fyri lívstíð. Var leiðslutíðin avmarkað, kom ein nátúrlig rotatiónsskipan í lag innanfyri tann einstaka stovnin og millum teir almennu stovnarnar. Tíverri verður alt ov sjáldan spurt eftir leiðsluevnum, tá almennir stovnsleiðarar verða settir. Tann týdningarmesti eginleikin hevur mangan verið politiskt tilknýti til teir ráðandi úti í Tinganesi.

Minnilutin metir, at ráðini ikki eru til íløgurnar, sum samgongan ætlar at gera í komandi ári. Landsstýrisflokkarnir hava sett 173 mió. av til íløgur, og nógv tann størsti parturin fer til óproduktiv endamál, serliga til infrastrukturin. Neyvan slepst undan at rinda eitt sindur til snøklar. Uppskot minnilutans verður tí at lækka íløgurnar við 127 mió. kr. soleiðis, at 46 mió. kr. standa eftir á hesari konto til 1993. Tær 46 mió. kr. til íløgur skulu býtast soleiðis: 6,9 mió. kr. til fiskivinnuna (grein 16), 2,1 mió. kr. til vinnulív og arbeiðsmarknað annars (grein 18), 3 mió. til mentan ( grein 15),8 mió. til skúlar (grein 14), 10 mió. til samferðslu og samskifti (grein 13), 10 mió. kr. til heilsuverkið (grein 12) og 6 mió. kr. til almannamál (grein 19).

Annars mælir minnilutin til at fremja rakstrarsparingar fyri 28 mió. kr., sum koma fram soleiðis: grein 19, íbúðarmál: 7 mió. kr., grein 15, mentan: 6. mió kr. (harav 3 mió. frá konto til politiska upplýsing), á grein 11, 12,13, 17 og 18 skulu sparast 3 mió. kr. á hvørjari grein.

Av hesum 28 mió. kr., sum spardar verða í rakstrinum, mælir minnilutin til, at 20 mió. kr. verða fluttar til § 16, rakstur av fiskivinnuni.

Samanborið við uppskot meirilutans, kemur uppskot minnilutans til fíggjarlóg at síggja soleiðis út:

| | **Meirilutin** | **Minnilutin** | **Munur** |
|---|---|---|---|
| Inntøkur | 2.699.005.000 | 2.648.005.000 | - 51.000.000 |
| Rakstur | 2.494.300.000 | 2.488.500.000 | - 5.800.000 |
| Íløgur | 175.314.000 | 46.314.000 | -129.000.000 |
| Avlop | 29.391.000 | 113.191.000 | 83.800.000 |

Minnilutin mælir til varsemi, tá mett verður um inntøkur landskassans, og minnilutin lækkar tí skatt- og tollinntøkurnar (íroknað meirvirðisgjald) við 50

mió. kr. Mælt verður til sparingar í rakstrinum fyri 28 mió. kr. og sparingar í íløgum fyri 127 mió. kr. Men burtur av sparingunum upp á 28 mió. kr. verða 20 mió. kr. fluttar til raksturin av fiskivinnuni. Sostatt verður avlopið á fíggjarlógini 118 mió. kr. í mun til 33 mió. kr. hjá samgonguni.

Við hesum viðmerkingum setir minnilutin (Finnbogi Arge) fram hetta uppskot til fíggjarlóg fyri 1993 (høvuðstøl:)

**Minnilutin (Finnbogi Arge):**

Uppskot til fíggjarløgtingslóg 1993:

| | **Inntøkur**<br>**Indtægter** | **Roknsk.**<br>**1991** | **Játtan**<br>**1992** | **1992**<br>**Endursk.** | **Játtan**<br>**1993** |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Inntøkuskattir<br>Indkomstskatter | 987687 | 1090000 | 1010000 | 862000 |
| 2 | Toll-, nýtslu- og framleiðslugjøld<br>Told-, forbrugs- og prod.afg. | 762269 | 831000 | 799000 | 863000 |
| 3 | Onnur gjøld<br>Andre afgifter | 3689 | 2450 | 2450 | 13100 |
| 4 | Inntøkur av spæli<br>Indtægter ved spil | 666 | 600 | 600 | 700 |
| 5 | Rentuinntøkur<br>Renteindtægter | 96027 | 60000 | 60000 | 65000 |
| 6 | Landsfyritøkur<br>Landsvirksomheder | | | | 11000 |
| 7 | Partur av avlopi tjóðbankans<br>Andel af nat.bankens oversk. | 34126 | 20000 | 20000 | 25000 |
| 8 | Gjøld frá danska ríkiskassanum<br>Overførs.fra den danske stat | 770877 | 789000 | 801500 | 807000 |
| 9 | Ymsar inntøkur<br>Diverse indtægter | 3111 | 2205 | 2205 | 1205 |
| | **Inntøkur tilsamans**<br>**Ialt** | **2658452** | **2795255** | **2695755** | **2648005** |

| | **Rakstrarútreiðslur**<br>**Driftsudgifter** | **Roknsk.**<br>**1991** | **Játtan**<br>**1992** | **1992**<br>**Endursk.** | **Játtan**<br>**1993** |
|---|---|---|---|---|---|
| 10 | Løgtingið<br>Lagtinget | 16549 | 16470 | 16044 | 14793 |
| 11 | Meginfyrisiting<br>Centraladministration | 156659 | 151085 | 146458 | 126356 |
| | Uttanríkismál<br>Udenrigsanliggender | 1849 | 4809 | 2800 | 1910 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 12 | Heilsumál<br>Sundhedsvæsen | 346467 | 342776 | 344419 | 319917 |
| 13 | Samferðsla<br>Kommunikation | 175723 | 150750 | 126702 | 96550 |
| 14 | Útbúgving og gransking<br>Uddannelse og forskning | 383567 | 373421 | 367427 | 340086 |
| 15 | Mentan<br>Kultur | 46077 | 45030 | 43575 | 34145 |
| 16 | Fiskivinna, sigling o.t.<br>Fiskeri, søfart m.v. | 527621 | 324777 | 301724 | 150430 |
| 17 | Landbúnaður<br>Landbrug | 35923 | 35971 | 33911 | 25530 |
| 18 | Vinnulív og arbeiðsmarknaður annars<br>Erhverv og arbejdsmarked iøvr. | 43464 | 77871 | 107197 | 72812 |
| 19 | Almannamál v. m.<br>Socialvæsen m.v. | 776287 | 758349 | 779755 | 806581 |
| | Íbúðarmál<br>Boligpolitiske anliggender | 2003 | 12700 | 7700 | 0 |
| 20 | Pensiónsútreiðslur<br>Pensionsudgifter | 11225 | 12140 | 12140 | 10690 |
| 21 | Effektivar veðhaldsbindingar<br>Effektive garantiforpligtelser | 167202 | 80000 | 190000 | 150000 |
| 22 | Rentuútreiðslur<br>Renteudgifter | 202150 | 223000 | 223000 | 318000 |
| 26 | Ymsar ognarútreiðslur<br>Diverse ejendomsudgifter | 145 | 700 | 700 | 700 |
| 27 | Óvissar útreiðslur<br>Uvisse udgifter | 20000 | 14000 | 0 | 20000 |
| | **Rakstrarútreiðslur tilsamans<br>Driftsudgifter ialt** | **2912911** | **2623849** | **2703552** | **2488500** |

| **Íløguútreiðslur/Íløgustudningar<br>Investeringsudg./Investeringstilskud** | | **Roknsk.<br>1991** | **Játtan<br>1992** | **1992<br>Endursk.** | **Játtan<br>1993** |
|---|---|---|---|---|---|
| 11 | Meginfyrisiting<br>Centraladministration | 6326 | 1500 | 1000 | 0 |
| 12 | Heilsumál<br>Sundhedsvæsen | 14835 | 32400 | 29300 | 10000 |
| 13 | Samskifti<br>Kommunikation | 210109 | 177300 | 167300 | 10000 |
| 14 | Útbúgving<br>Uddannelse og forskning | 10881 | 28200 | 20000 | 8000 |
| 15 | Mentan<br>Kultur | 12547 | 16200 | 11550 | 3000 |
| 16 | Fiskivinna, sigling o.t.<br>Fiskeri, søfart m.v. | 8464 | 9000 | 9000 | 6900 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 18 | Vinnulív og arbeiðsmarknaður annars<br>Erhverv og arbejdsmarked ivr. | 1053 | 3200 | 1700 | 2100 |
| 19 | Almannamál<br>Socialvæsen m.v. | 22333 | 17800 | 10907 | 6314 |
| **Íløguútreiðslur/Íløgustudningar tils.<br>Investeringer/Inv.tilsk.ialt** | | **286548** | **285600** | **250757** | **46314** |

| **Samandráttur<br>Sammendrag** | **Roknsk. 1991** | **Játtan 1992** | **1992 Endursk.** | **Játtan 1993** |
|---|---|---|---|---|
| Inntøkur tilsamans<br>Indtægter ialt | 2658452 | 2795255 | 2695755 | 2648005 |
| Rakstrarútreiðslur tilsamans<br>Driftsudgifter ialt | 2912911 | 2623849 | 2703552 | 2488500 |
| Rakstrarúrslit<br>Driftsresultat | -254459 | 171406 | -7797 | 159505 |
| Íløgur/íløgustudningar<br>Investeringer/inv.tilskud | 286548 | 285600 | 250757 | 46314 |
| Úrslit aftan á íløgutreiðslur<br>Resultat efter investeringer | -541007 | -114194 | -258554 | 113191 |

Ein minniluti (Finnbogi Ísakson) ger hesar viðmerkingar:

Eftir boðum frá forsætisráðnum gjørdi landsstýrið eitt nýtt uppskot til fíggjarlóg fyri 1993. Forsætisráðið kravdi, at hetta uppskot skuldi vera realistiskt, og at tað skuldi javnviga.

Sambært nýggja uppskot landsstýrisins skuldi fíggjarlógin fyri 1993 hava 2.991 mió. kr. í avlopi. Meirilutin í fíggjarnevndini hevur mælt til at gera nakrar broytingar, so at avlopið verður 28,2 mió. kr.

Minnilutin ivast stórliga í, um hetta uppskotið er realistiskt. Vandi er fyri, at hvørki inntøku- ella útreiðslumetingar fara at halda. Sum grund fyri hesum sjónarmiði skal nevnast: 1) Inntøkurnar eru settar út frá teirri meting, at virksemið í samfelagnum fer at minka 11% í 1993. Onki verður sagt um, hvussu landsstýrið er komið fram til hetta tal. Hvussu nógv virksemið fer at minka er fyrst og fremst treytað av, hvussu tað fer at gangast fiskivinnuni.

Landsstýrið hevur skert játtanina til fiskivinnuna soleiðis, at fiski- og útróðrarmenn onki prísískoyti fara at fáa. Harafturímóti eru 55 mió. kr. settar av til skipini, men hesin stuðul skal ikki latast sum kilostudningur.

Onki er komið fram frá landsstýrinum um, hvussu hesin stuðul skal latast, og hvussu verða skal við fiskiflotanum. Útgerðarmenn siga, at um stuðulin ikki verður hækkaður, verður stórur partur ella allur flotin lagdur.

Hendir hetta - í longri ella stytri tíð av árinum 1993 - kann tað hava við sær, at virksemið minkar meira enn tey mettu 11%. Inntøkur landskassans verða samsvarandi minni.

2) Frá 1. januar verða sera tungar byrðar lagdar á tað vanliga fólkið - meirvirðisgjald (sum m.a. dýrkar flest allar vørur og haraftrat allar tænastur so sum telefon, útvarp, sjónvarp, SEV), punktgjøld, lægri rentufrádráttur, hægri oljugjald o.a. Alt hetta fer at hava við sær, at keypiorkan minkar munandi. Tað er tí ivasamt, um inntøkumar av óbeinleiðis skatti - hóast hækkingar - fara at halda.

3) Ronkað er við, at 96 mió. kr. skulu sparast í almennum lønum. Eftir uppskoti frá landsstýrinum hevur løgtingið longu við lóg lækkað ársinntøkuna hjá tímalønum 2,5% og hjá alment løntum 1,5%. Henda lógfesta almenna lønarlækkingin minkar landskassans útreiðslur 24 mió. kr., verður sagt.

72 mió. kr. eru so eftir at spara. Sáttmálarnir við tey almennu fakfeløgini fara ikki úr gildi fyrr enn 1. juni 1993. Løgtingið eigur at fáa at vita frá landsstýrinum, um ætlanin er at spara hesar 72 mió. kr. seinna hálvár av 1993, møguliga við lóg.

Verða tær ikki spardar, broytir bert hetta yvirskot á fíggjarlógini til eitt undirskot.

4) Landsstýrið miðar eftir, at allar lønir í samfelagnum skulu lækka 10%. Hetta merkir, at minni peningur verður í umfari í samfelagnum.

Roknast má við, at lønarniðurskurður fer at hava somu margføldu ringávirkan sum ein lønarhækking, men øvugta veg, t.v.s. at cins og peningur, ið verður latin í umfar, verður umsettur einar 6 ferðir ella meira, fer ein lønarniðurskurður at merkjast í fleiri liðum. Somuleiðis kann hesin politikkur hava við sær, at um eitt ár ella so er niðurgongdin komin so langt, at landsstýrið kanska sær eim lønarniðurskurð aftrat sum einstu gongdu leið.

Eisini hetta kann hava við sær, at inntøkur landskassan verða minni enn mett.- Fíggjarlógin avspeglar støðuna í samfelagnum sum heild: Framhaldandi niðurskurður á øllum økjum, lønarlækking, vaksandi arbeiðsloysi, ongi tiltøk fyri at fáa gongd á aftur og vaksandi almenn skuld.

Við tí førda politikkinum er ilt at síggja nakran glotta. Landsstýrið hevur ongan fiskivinnupolitikk, eyðræningin av grunnum heldur fram, onki hugskot er um nýggjar vinnuvegir. Samstundis verða skatta- og avgjaldslóginar broyttar soleiðis, at tey, sum eru frægast fyri í samfelagnum, verða betur fyri, meðan tey, sum frammanundan hava ov lítið, skulu bera størri part av byrðuni. Úrslitið verður eitt stættarsamfelag, sum søga føroyinga ikki hevur sæð í øldir og kanska ongantíð.

Á teirri endurskoðaðu fíggjarlógini fyri 1992 eru 220 mió. kr settar av til rentur av lánum landskassans. Hesar rentuútreiðslur eru settar til 315 mió.kr. í 1993. Aftrat hesum koma rentur av lánum hjá almennum stovnum, kommunum, interkommunalum stovnum og privatum.

Rentuútreiðslurnar hjá samfelagnum eru so stórar, at tað sæst ikki nakar endi á teimum. Tað er ilt at síggja, hvussu landskassin við so stórum rentuútreiðslum -

og tær fara væntandi at vaksa uppaftur meira - í nærmastu framtíð gerst førur fyri at seta pening av til avdráttir eisini.

Ein grundleggjandi umskipan av øllum samfelagnum er tí neyðug. Endamálið má verða at fáa vinnutólini at virka og at laga tað soleiðis, at ikki fleiri ættarlið av eftirkomarum okkara bert skulu stríðast við at gjalda rentur. Samráðingar eiga at verða tiknar upp millum løgtingið og ríkisstjórnina um eina skipan, har ríkisstuðulin innan ásetta tíð fellur burtur, og uttanlandsskuldin verður sanerað. Umskipanin eigur samstundis at hava við sær, at rætturin at taka avgerðir og ábyrgdin eru á sama stað, tvs. at føroyingar fáa fullan sjálvsavgerðarrætt og alla ábyrgd av sær sjálvum.

Minnlutin kann ikki taka undir við uppskoti landsstýrisins ella meirilutanum í fíggjarnevndini og setir tí onki uppskot fram.

Minnilutin (Asbjørn Joensen) førir fram:

Rímiligt er at minnast aftur á viðgerðina av 1. framløgu til fíggjarlóg fyri árið 1993, nú vit eftir harraboðum úr Danmørkini hava fingið álagt at gera enn eina roynd at fáa til vega uppskot, ið kallast skal reelt.

Við 1. framløgu viðmerkti sjálvstýrisflokkurin undir viðgerðimi, at uppskotið, ið vísti hall við 150 mió. kr., var vánaliga tilvirkað, hevði ongar møguleikar til at verða hildið, og tá ikki ólíkt fíggjarlóginí fyri 1992, ið nú má fáa ein annex upp á slakar 700 mió. kr.

Henda seinna framløgan og viðgerð av fíggjarlóg fyri 1993 og hetta tyssið av fylgilógum, ið økja um skatta- og avgjaldsstrýstið, eru avleiðingarnar av vánaligari stýring, og valla loysnin til at fáa búskap okkara aftur á føtur.

Tað tænir ongum endamáli, at samgongan sýtir fyri tí veruleika, at oyggjar okkara eru settar undir frumanda umsiting, grundað á vánaliga stýring og meiningsleysar íløgur, ið byggja á trongskygni hjá eins væl politikarum, vinnulívsmonnum sum peningastovnum okkara.

Men vit hava framvegis møguleikan at áleggja okkum sjálvum tær treytir, ið eru neyðugar, skulu vit nakrantíð fóta okkum aftur. Hóast tað er beiskur biti hjá mongum.

Tað er ófatuligt, at samgongan framvegis kann finna tað fyri rímiligt at undirbudgetera, so sum framført verður, tá vit vita, at møguleikin fyri at framleiða seg úr teim trupulleikum, hesar undirbudgeteraðu upphæddir, ið seta krøv til lántøkur, ikki eru møguligur meira. Slíkur framferðarháttur er tekin um dugnaloysi.

Hóast roynt verður at vera meira skynsamur við hesum uppskotinum, tað veri seg við niðurskurði við sløkum 100 mill. kr. til íløgur, har upphæddin nú er broytt frá teim upprunaligu 260 mill. til tær nú 180 mill., so er tað framvegis hugsan landsstýrisins, at tríggjar mill. kr. skal verða rímilig upphædd til at taka, um skeivt er mett.

Hetta minnir meira um gaman enn álvara.

Valla skuldi tað verið so, at vit enn eina ferð sum eitt triðja uppskot skulu til at leggja fram fíggjarlóg fyri 1993, uppskot, ið tá er fyriskrivað av dønum ella øðrum fremmanda fólki.

So fegin vit vildu, so kenur ikki at renna saman millum samgongu og sjálvstýrisflokkin í hesi budgeteringsætlan, eftir stendur eisini tann stóri spurningurin um, hvar hesar av landsstýrinum fyriskrivaðu upphæddir í milliónum skulu koma frá.

Víst kenna vit øll samgonguloysnina, hesa undurfullu loysnina, ið nevnist MVG. 1. januar 1993 verður hendan skipan landsstýrisins sett í verk, men sera stór er óvissan, um metta inntøkan við MVG gjaldinum kemur at geva landskassanum tær 580 mill. kr., sum roknað verður við, nú keypiorkan er minkað so munandi orsakað av teim mongu eyka inntøkulógunum, helst verður talið væl minni, og hvørji eru ráðini tá til at taka?

Í áliti meirilutans sæst, at hesin reservin 3 mill. kr. er hækkaður til 27 mill. kr., ein bati rætta vegin, ið kortini ger minni mun.

Sjálvstýrisflokkurin harmast, at tilráðing floksins ikki varð fylgd um, at ein tillagingarætlan yvir nøkur ár gjørdist veruleiki soleiðis, at bæði vinnuni, arbeiðsmarknaðinum og tí einstaka vinnurekandi gevast stundir til at taka ímóti og fyrireika seg til komandi avbjóðingar.

Helst verður hastaða tiltak samgongunnar kærkomið fyri teir fáu, men fátæksligt verður samfelagsmynstrið, tá eins væl bygdahandilin sum tann lítla vinnufyritøkan verður burtur, tí ongin ivin er um, "at kun den stærke og store overlever."

Samsvarandi omanfyri standandi setir minnilutin fram soljóðandi:

## III Uppskot

## til

## samtyktar

Mælt verður til at útseta MVG gjaldið til 1994.

Av íløguætlan samgongunnar er ætlanin at heilar 93,5 mill. kr. skulu til samskifti, og tað verri er, øll hendan íløga verður løgd á tveimum ella trimum støðum, nú vinnuloysi er um alt landið. Tað meiningsleysa í at gera stóríløgu í oljudrivin amboð, nú fleiri túsund hendur hanga tómar við lið, er heilt burturvið og borgar fyri evnaloysi.

Um hendan upphædd ikki eigur at standa órørd til at taka fyri at brynja okkum ímóti nýggjum diktati uttanífrá, so eigur hendan upphædd, so sum sjálvstýris-

flokkurin áður hevur ávíst, at vera partur av arbeiðsskapandi tiltøkum í øllum kommunum, har vinnuloysi er.

Tey arbeiði henda upphædd er tilætlað, er sum tíðirnar eru, bæði ógrundað óneyðug fyri ikki at siga heilt órímulig.

Henda fløgan vildi, um okkara tilráding verður fylgd, verður gott og gagnligt ískoyti hjá kommununum, sum nú flestar eru hart trongdar, lutvíst tí løgtingið við lóggávu bæði viðvíkjandi DIS og FAS skipanini hava avmarkað inntøku kommununnar munandi.

Vísandi til tað, her er ført fram, verður sett:

## IV Uppskot

## til

## samtyktar

1. Upphæddin 100 mill. kr. verður til at taka, tá inntøkuupphæddin valla verður at halda eftir ætlan.
2. Upphæddin verður at tillutað kommunum til arbeiðsskapandi tiltøk.

Onnur áhugaverd upphædd á fíggjarlógaruppskoti landsstýrisins er tvísifrað upphædd í mill. kr., til havnabygging ella annað í kommunu, ið fíggjarliga er í tí tunga endanum, hvat skuld viðvíkir.

Áhugavert er at frætta frá landsstýinum um, hvør orsøkin er til at tyngja skuldarbyrðu hjá hesi kommunu eun meira 6 - 7 mill. kr.

Ella er hatta møguligt stuðul til ávísa fyritøku, ið hevur fastatøkur innan samgonguna, tað hevur tá okkara áhuga at frætta, hvørjar treytir landskassans eru, og hvar hesin hevur tryggja sína fløgu.

Kann tað hugsast, at her er talan um framhald av politiskum leiki, sum hevur fingið so drúgva viðgerð á Hafnia seinastu tíðina. Í seinasta lagi eigur grannskoðanardeild landskassans at kunna politiska valdið um kontering av upphædd 10 mill. kr.

Einhvør fíggjarlóg er avmyndað í tølum og aftrat hesum ein verbal fráboðan, ið avmyndar ætlaðan politikk.

So er ikki á hesum sinni, og eigur møguligt stutta skobráðið sína skuld í hesum, men eitt nú tá talan er um so týðandi mál sum fiskivinnuna, kann tørvandi kunning ikki nýtast sum umbering.

Íløgan í fiskivinnuna er munandi minkað, og er helst onki løgið í tí, nú lítið er til fong. Havandi kunning í fíggjarnevndini í luga frá serkønum innan sjóvinnuna um, at stuðulin átti at verið tvífaldaður frá teim 55 mill. kr. til 100 mill. kr., um vinnuni skal verða lív lagað, og samanber ein hesa tilráðing við tilráðing frá

figgjarfrøðingum eins væl og tað, fiskifrøðingar royna at gera vart við, tá eru óvanlig tiltøk fyri neyðini, um roynast skal at koma undan eini enn størri vanlukku innan fiskivinnuna.

Tað kann tí tykjast løgið, at landsstýrið ikki í viðmerkingunum letur við seg koma og grundar sín niðurskurð í stuðlinum, ella eisini fyri at sleppa undan, grundar tøgnin á evnaloysi og máttloysi hjá fiskivinnunevndini, hvørs politikkur meira líknar manipolering enn veruligum fiskivinnupolitikki.

Samsvarandi hesum verður sett:

## V Uppskot

## til

## samtyktar

Landsstýrinum verður saman við fiskivinnunevndini álagt at skerja partrolaraflotan við 40%.

Ein beinleiðis avleiðing av, at tann føroyski fiskiflotin er ov stórur, er, at fiskastovnarnir eru niðurfiskaðir.

Tað er tí lívsneyðugt, at vit nú fáa sett eitt ráð, óheft og uttanveltað, sum fær myndugleika at fremja stovnsrøka, til dømis føroyskar og útlendskar fiskifrøðingar í samráð. Teir sum hava privat peningalig áhugamál í fiskivinnuni, eiga undir ongum umstøðum at vera við til at taka hesar avgerðir.

Tað kann tykjast ógvuliga løgið, at landsstýrið ger stóríløgu í smoltframleiðslu, samstundis sum tað verður minkað munandi um smolttilgongd, grundað á tørvandi íløgupening í hendan týðandi ídnað.

Hetta smolttiltakið hevur tí ongan skund, sum støðan er.

Sjálvstýrisflokkurin mælir tí til at gevast við íløgum í hetta einkisigandi og minni vinnugevandi projekt, og setir uppskot fram um hetta.

## VI Uppskot

## til

## samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at skerja burtur alla játtan til lívfiskastøð í Skopun fyribils 2 - 3 ár.

Viðvíkjandi greinini um útbúgving verður tikið undir við meirilutanum so langt, at hetta alt samalt er ein íløkja, ið hevur fyri neyðini at verða greidd.

Flytan, umleggin og íløgur eru hvørt um annað tvinnað saman, so trupult er hjá løgtingi at leita fram sonnu myndina.

Óneyðugar íløgur, ið ikki hoyra tíðini til, koma eisini upp á tal, so trupult er at taka fyriliggjandi tilfar í álvara.

Sjálvstýrisflokkurin tekur undir við meirilutanum um at samskipa og spara burtur útbúgvingar, ið ikki hava beinleiðis samfelagstørv, og sum tá er íløga til gagns fyri fremmandan ídnað við meira, so leingi fíggjarstøða okkara er so vánalig.

## Broytingaruppskot

## í

*løgtingsmáli nr. 34/1992: Fíggjarløgtingslóg 1993 (2. framløga).*

Undirritaðu løgtingsmenn seta fram soljóðandi:
Broytingaruppskot til § 14: Samferðsla og samskifti.

| | | | |
|---|---|---|---|
| 13061 | Berghol- og brúgvagerð | | |
| | verður lækkað við | kr. 3.200.000 | |
| | og sett til | | kr. 22.800.000 |

**Viðmerkingar:**
Peningurin verður at nýta soleiðis:

| | |
|---|---|
| 1. Framhaldandi arbeiði Lopra-Sumba | kr. 9.000.000 |
| 2. Bø - Gásadal | kr. 9.000.000 |
| 3. Vestmannasund | kr. 800.000 |
| 4. At taka til | kr. 4.000.000 |
| | kr. 22.800.000 |

**Lopra - Sumba:**
Hildið verður fram við arbeiðnum.

**Bø - Gásadal:**
Arbeiðið verður sett í verk soleiðis, at sjálv bergholsgerðin fer í gongd seinnu helvt í 1993 við tí fyri eyga at fáa skotið ígjøgnum í 1994.

**Vestmannasund:**
Peningurin verður at nýta til umsjón og røkt v.m. av útgerð til tunnil undir Vestmannasund.

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Bygging av undirsjóvartunnli undir Vestmannasund verður ikki sett í verk, fyrr enn Føroya Løgting hevur samtykt at farast kann undir hesa verkætlan.

| | | | |
|---|---|---|---|
| 13081 | Nýggir vegir og brýr, breiðkan av brúm, størri ábøtur v.m. | | |
| | lækkað við | kr. 2.800.000 | |
| | og verður sett til | | kr. 21.200.000 |

**Viðmerking:**

Peningurin verður at nýta soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Vágur - Lopra | kr. 1,0 mió. |
| 2. | Trongisvágur - Øravík | kr. 0.5 mió. |
| 3. | Vegagerð á Sandi | kr. 1,0 mió. |
| 4. | Syðradalsvegur (S) | kr. 0,5 mió. |
| 5. | Tórshavn - Kirkjubøur | kr. 4,0 mió. |
| 6. | Kollafjørður - Hósvík | kr. 2,0 mió. |
| 7. | Oyri - Svínáir | kr. 1,5 mió. |
| 8. | Funning - Fjarðarvegurin | kr. 1,5 mió. |
| 9. | Strendur - Skála | kr. 1,5 mió. |
| 10. | Grótrætt - Haraldssund | kr. 0,7 mió. |
| 11. | Klaksvík - Norðoyar | kr. 1,5 mió. |
| 12. | Syðradalur - Trøllanes | kr. 1,5 mió. |
| 13. | Múlavegurin | kr. 0,5 mió. |
| 14. | Fugloy | kr. 0,3 mió. |
| 15. | Rundkoyring i Tórshavn | kr. 1,0 mió. |
| 16. | At taka til/felags | kr. 2,2 mió. |
| | | kr. 21,2 mió. |

**§ 14 Fólkaskúlar nýbyggingar**

Í seinastu fíggjarlóg álegði Føroya løgting Føroya landsstýri at endurgjalda kommunum sbrt. fylgiskjal írestandi studning í samband við skúlabygging. Hesin peningur skuldi gjaldast yvir fíggjarlógirnar 1993- 94-95.

Á fyriliggjandi fíggjarlóg er eingin peningur avsettur til hetta endamál, og skjýtur meirilutin tí upp, at landsstýrið útvegar hesa upphædd innan karmin á fíggjarlógini ella á annan hátt.

Tí verður sett fram soljóðandi:

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður Føroya landsstýri at finna útvegir fyri at fylgja upp áheitanini á síðu 5 í álitinum frá fíggjarnevndini í løgtingmáli nr. 2/1991.

**Broytingaruppskot**

**í**

*løgtingsmáli nr. 34/1992: Fíggjarløgtingslóg 1993 (2. framløga).*

**§ 13 Samferðsla og samskifti**

13265 Strandfaraskip Landsins

**Ískoytisviðmerking**

Ferðasambandið sjóvegis "Skálafjørður - Tórshavn" heldur fram, til landsstýrið hevur funnið aðra loysn á málinum.

**Broytingaruppskot**

**í**

*løgtingmáli nr. 34/1992: Fíggjarløgtingslóg 1993 (2. framløga).*

**§ 16 Fiskivinna, sigling o.t.**

**Stuðul til fiskivinnuna**

Afturat viðmerkingini um, at avlop av stuðuli til fiskivinnuna fíggjarárið 1992 verður at flyta til sama rakstrarstað fíggjarárið 1993, verður sett: "Partur av hesum avlopi kann nýtast til komandi broytta lóggávu frá landsstýrinum og arbeiðaramálanevndini um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m."

**Broytingaruppskot**

**í**

*løgtingsmáli nr. 34/1992: Fíggjarløgtingslóg 1993 (2. framløga).*

**§ 12 Heilsumál**
Rakstrarstað 303243 Viðgerð av rúsdrekkamisnýtarum "6900" verður broytt til "8.500"
Samanteljingarnar í fíggjarlóginí verða broyttar samsvarandi.

**Broytingaruppskot**

**í**

*løgtingsmáli nr. 34/1992: Fíggjarløgtingslóg 1993 (2. framløga).*

1. **§ 6 Landsfyritøkur**
Einkarsølan verður hækkað úr kr. 10 mió. við kr. 1,6 mió. til kr. 11,6 mió.

2. **§ 12 Heilsumál**
Rakstrarstað 12907/ 303243 viðgerð av rúsdrekkamisnýtarum

**Viðmerking:**

Landsstýrið fremur samskipan av viðgerð og fyribyrgjandi arbeiði í samband við rúsdrekkamisnýtslu.

# 35. Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verða hesar broytingar gjørdar:

1) § 1, nr. 6 verður orðað soleiðis:
"Fulla skattskyldan hjá persóni, sum er settur í skatt eftir reglunum í nr. 5, fellur tó burtur frá tí degi, viðkomandi persónur við sýndum skjølum kann sanna at vera búsitandi uttanlands og at vera settur í inntøkuskatt í øðrum landi, Danmark ella Grønlandi, eftir reglum, ið galda fyri búsett har, jbr. nr. 2 í hesi grein."

2) § 2, litra g verður orðað soleiðis:
"fáa vinningsbýti úr Føroyum".

3) Í § 2, stk. 1 verður sum nýtt litra k sett:
"Fáa rentu, sum verður skattað sambært løgtingslóg um rentuskatt. Henda regla er bert galdandi fyri persónar og deyðsbúgv."

4) Í § 3 verður sum nýtt stk. 4 sett:
"Landsstýrið kann við kunngerð áseta nærri reglur viðvíkjandi veit-

*lagtingslov om ændring af lagtingslov om landsskat og kommuneskat.*

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) § 1, nr. 6 affattes således:
"Den fulde skattepligt hos person, der er sat i skat i henhold til bestemmelserne i nr. 5 bortfalder dog fra det tidspunkt, denne godtgør at have bopæl i udlandet og at være undergivet indkomstbeskatning til fremmed stat, Danmark eller Grønland efter reglerne for derboende personer, jfr. nr. 2 i denne paragraf."

2) § 2, litra g affattes således:
"får udbytte fra Færøerne".

3) I § 2, stk. 1 indsættes som nyt litra k:
"Får rente, som bliver beskattet i henhold til lagtingslov om renteskat. Denne bestemmelse gælder dog kun personer og dødsboer."

4) I § 3 indsættes som nyt stk. 4:
"Landsstyret kan med bekendtgørelse fastsætte nærmere regler

ing av skattafrælsi eftir stk. 2 og 3 í hesi grein."

5) § 25, nr. 3 verður orðað soleiðis:

"Renta ella vinningur av skuldarbrøvum, partabrøvum og øðrum virðisbrøvum, av útistandandi fíggjarkrøvum og av útlæntum peningi tó ikki vinningsbýti frá partafeløgum, lutafeløgum o.ø. skrásett í Føroyum, jbr. § 1, nr. 8-15 í hesi løgtingslóg, og renta, sum likamligir persónar og deyðsbúgv fáa av peningi innistandandi í føroyskum peningastovnum og postgiro, og sum verður skattað sambært løgtingslóg um rentuskatt, smbr. tó § 5, stk. 6 í hesi løgtingslóg."

6) § 29, nr. 13 verður orðað soleiðis:

"Ellisviðbót eftir § 10, persónlig viðbót eftir § 14 og hjálpar-, røktar- og avlamisviðbót eftir § 16 í lóg nr. 58 frá 15. mars 1967 um fólkapensjón við seinni broytingum, avlamisgjøld eftir § 4, stk. 2, hjálpar- og røktarviðbót eftir § 11, persónlig viðbót eftir § 15, avlamisveiting, hjálpar- og røktarviðbót hartil eftir § 16, veitingar eftir §§ 31 og 32 og avlamisviðbót og hjálparviðbót eftir § 45 í lóg nr. 55 frá 15. mars 1967 um avlamispensjón við seinni broytingum og veitingar eftir §§ 9, 15, 16, 17 og 18 og persónligar viðbøtur eftir § 13, stk. 2 og § 29, stk. 2 í lóg nr. 56 frá 15. mars 1967 um almenna forsorg við seinni broytingum."

7) Í § 30, stk. 1 verður "20%" broytt til: "35%".

vedrørende bortfald af skattepligt efter stk. 2 og 3 i denne paragraf."

5) § 25, nr. 3 affattes således:

"Rente eller udbytte af obligationer, aktier og andre værdipapirer, af udestående fordringer og af udlånt kapital, dog ikke udbytte fra på Færøerne registrerede aktieselskaber, andelsselskaber o.a., jfr. § 1, nr. 8-15 i denne lagtingslov, samt rente, som fysiske personer og dødsboer får af indestående i færøske pengeinstitutter eller postgiro, og som bliver beskattet i henhold til lagtingslov om renteskat, jfr. dog § 5, stk. 6 i denne lagtingslov."

6) § 29, nr. 13 affattes således:

"Alderstillæg efter § 10, personlige tillæg efter § 14 og bistands-, pleje- og invaliditetstillæg efter § 16 i lov nr. 58 af 15. marts 1967 om folkepension med senere ændringer, invaliditetsbeløb efter § 4, stk. 2, bistands- og plejetillæg efter § 11, personligt tillæg efter § 15, invaliditetsydelse, bistands- og plejetillæg hertil efter § 16, ydelser efter §§ 31 og 32 og invaliditetstillæg og bistandstillæg efter § 45 i lov nr. 55 af 15. marts 1967 om invalidepension m.v. med senere ændringer samt ydelser efter §§ 9, 15, 16, 17 og 18 og personlige tillæg efter § 13, stk. 2 og § 29, stk. 2 i lov nr. 56 af 15. marts 1967 om offentlig forsorg med senere ændringer."

7) I § 30, stk. 1 ændres "20%" til: "35%".

8) Í § 31, stk. 1 verða orðini "skal frá inntøkuni verða drigin rakstrarkostnaður," t.e. broytt til:

"skal frá inntøkuni verða drigin rakstrarkostnaður, tó ikki rakstrarkostnaður, ið persónar skattskyldugir eftir § 1 í hesi lóg hava, og ið stendst av at vinna A-inntøku og inntøku av persónligum arbeiði í tænastu fyri onnur, jbr. § 57, stk. 2, § 60 og § 62 í hesi lóg. Rakstrarútreiðslur, t.e."

8) I § 31, stk. 1 ændres ordene "foretages fradrag for driftsomkostninger" til:

"foretages fradrag for driftsomkostninger, dog ikke driftsomkostninger, som personer skattepligtige efter § 1 i denne lov har i relation til indtjening af A-indkomst og indkomst af personligt arbejde i tjenesteforhold, jfr. § 57, stk. 2, § 60 og § 62 i denne lov. Driftsomkostninger".

9) Í § 33, nr. 1, pkt. 3 verður "løgtingslóg nr. 4 frá 26. mars 1953 um inntøkuskatt av rentum av innistandandi peningi í føroyskum bankum og sparikassum við seinni broytingum" broytt til: "løgtingslóg um rentuskatt." og sum nýtt pkt. 4 verður innsett:

"Mótrokningarreglurnar í hesi reglu eru tó ikki galdandi fyri partafeløg, lutafeløg og onnur skattskyldug feløg."

9) I § 33, nr. 1, pkt. 3 ændres "lagtingslov nr. 4 af 26. marts 1953 om indkomstskat af renter af indestående kapital i færøske banker og sparekasser med senere ændringer" til: "lagtingslov om renteskat." og som nyt pkt. 4 indsættes:

"Modregningsreglerne i denne bestemmelse er dog ikke gældende for aktieselskaber, andelsselskaber og andre skattepligtige selskaber."

10) § 33 verða nr. 1 a, 1 b og 1 c, 3, 7 og nr. 8, litra a-d, f og g og nr. 13 sett úr gildi. Nr. 4-6 verða hereftir nr. 3-5. Nr. 8, litra e verður nr. 6 og verður orðað soleiðis:

"Giftur persónur, sum flytir í aðra kommunu at arbeiða har, fær frádrátt fyri dupult húsarhald soleiðis, at loyvdur verður ein ávísur mánaðarligur frádráttur fyri útreiðslur til leigu av høli og ein ávísur frádráttur um dagin fyri eykaútreiðslur til kost. Tað verður tó bert loyvt at draga útreiðslurnar frá í tann mun, samanlagda upphæddin fer

10) I § 33 ophæves nr. 1 a, 1 b og 1 c, 3, 7 og nr. 8, litra a-d, f og g, og nr. 13. Nr. 4 - 6 bliver herefter 3-5. Nr. 8, litra e bliver herefter nr. 6 og affattes således:

"En gift person, der flytter i en anden kommune end bopælkommunen for at arbejde der, kan få fradrag for dobbelt husførelse således, at der tillades et fast månedligt fradrag for udgifter til leje af værelser og et fast fradrag om dagen for merudgifter til kost. Kun den del af udgifterne, der overstiger et fast beløb, der fastsættes af

upp um ávísa upphædd, ið Líkningarráðið ásetir í seinasta lagi 1. oktober galdandi fyri komandi inntøkuár." Nr. 9-12 verða hereftir nr. 7-10.

11) § 46, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Kommunuskatturin verður álíknaður av somu skattskyldugu inntøku, sum nýtt verður, tá landsskatturin verður álíknaður. Eingin kommunuskattur verður tó álíknaður skattskyldugu inntøkuni frá 0-12.000 kr."

12) Í § 46, stk. 2 og 5, og í § 46 a, stk. 1, 2 og 3 verður "14%" broytt til: "13%".

13) Í § 46 b verður orðingin: "§ 33, nr. 1 a og b" strikað.

14) § 47, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"**Stk. 2.** Um landsskattafrádráttin í landsskattinum sambært § 3 í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan við seinni broyting ikki verður nýttur til fulnar, skal restin dragast frá í útroknaða kommunuskattinum."

15) Í § 47, stk. 3 verður síðsta pkt. strikað.

16) § 63 a, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Av teirri løn, frítíðarløn, samsýning v.m. jbr. § 60, ið ein persónur, búfastur í Føroyum, ella eitt partafelag, íognarfelag, partsreiðarí, annar felagsskapur ella felag, skrásett í Føroyum og har veruliga leiðslan hevur høvuðssæti í Føroyum, rindar persónum skattskyldugum í Føroyum fyri tænastu um-

Ligningsrådet senest 1. oktober, som gældende for det kommende indkomstår kan fradrages." Nr. 9-12 bliver herefter nr. 7 - 10.

11) § 46, stk. 1 affattes således:
"Kommuneskatten pålignes af samme skattepligtige indkomst, som anvendes ved påligningen af landsskatten. Der pålignes dog ingen kommuneskat af den skattepligtige indkomst fra 0-12.000 kr."

12) I §§ 46, stk. 2 og 5, og i § 46 a, stk. 1, 2 og 3 ændres "14%" til: "13%".

13) I § 46 b udgår ordene: "§ 33, nr. 1 a og b".

14) § 47, stk. 2 affattes således:
"**Stk. 2.** Såfremt landsskattefradrag, som kan fradrages i landsskatten i henhold til § 3 i lagtingslov nr. 87 af 1. september 1983 om fastsættelse af skat til landskassen med senere ændringer ikke kan benyttes fuldt ud, kan restbeløbet fradrages i den udregnede kommuneskat."

15) I § 47, stk. 3 udgår sidste pkt.

16) § 63 a, stk. 1 affattes således:
"Af den løn, feriepenge, vederlag m.v., jfr. § 60, som en person bosiddende på Færøerne eller et aktieselskab, interesseselskab, partsrederi, andre selskaber eller foreninger indregistreret på Færøerne og hvor den virkelige ledelse har hovedsæde på Færøerne, som ydes personer skattepligtige på Færøer-

borð á skipi, skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni, FAS, verður borið reiðaravirkinum aftur, so sum ásett í hesi grein. Reglurnar um afturbering eru eisini galdandi fyri tænastu umborð á skipi, sum eftir § 2, stk. 1, litra j, 2. pkt. í hesi lóg verða javnmett við skip, ið eru skrásett við heimstaði í Føroyum, og sum, um tey vóru føroysk, lúka treytirnar í § 1, stk. 1 í løgtingslóg um Føroyska Altjóða Skipaskrá. Reglurnar um afturbering eru ikki galdandi fyri tænastu útint á skipi, sum eftir § 2, stk. 1, litra j, 3. pkt. ikki verða mett sum skip við heimstaði í Føroyum."

ne som vederlag for arbejde udført ombord på et skib indregistretet i det Færøske Internationale Skibsregister, FAS, refunderes til rederiet i henhold til bestemmelserne i denne paragraf. Bestemmelserne om refusion er også gældende for tjeneste udført ombord på skibe, som i henhold til § 2, stk. 1, litra j, pkt. 2 i denne lov, sidestilles med skibe, der er registreret med hjemsted på Færøerne og som, såfremt de var færøske, opfylder de i § 1, stk. 1 i lagtingslov om "Føroyska Altjóða Skipaskráseting" fastsatte krav. Bestemmelserne om refundation er ikke gældende for tjeneste udført på skibe, som i henhold til § 2, stk. 1, litra j, pkt. 3 ikke anses som skib, registreret med hjemsted på Færøerne."

17) Í § 93 verður stk. 4 strikað.

17) I § 93 ophæves stk. 4.

18) § 103, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"Øll tey, ið hava skyldu at føra bókhald, eins og deyðsbúgv, feløg, felagsskapir, stovnar v.m. skulu lata fylgja við sjálvuppgávuni rakstrarroknskap og fíggjarstøðu í byrjan og enda rakstrarársins. Landsstýrið kann við kunngerð áseta nærri krøv til ta skattligu uppgerðina og tað skattliga roknskapargrundarlagið."

18) § 103, stk. 1 affattes således:

"Personer, der er bogføringspligtige, samt dødsboer, selskaber, foreninger og andre institutioner skal som bilag til selvangivelsen indsende driftsregnskab og opgørelse over status ved det pågældende driftsårs begyndelse og slutning. Landsstyret kan med bekendtgørelse fastsætte nærmere bestemmelser vedrørende den skattemæssige opgørelse og det skattemæssige regnskabsgrundlag."

19) § 103, stk. 2 verður orðað soleiðis:

"Landsstýrið hevur heimild til eftir tilmæli frá Líkningarráðnum at áseta, at tey, ið hava atvinnu,

19) § 103, stk. 2 affattes således:

"Efter indstilling af ligningsrådet kan landsstyret bestemme, at udøvere af et erhverv for hvilket, der

sum lóggávan annars ikki fyriskipar bókhaldsskyldu, skulu hava skyldu at føra bókhald, sum ger teimum krøvum fulnað, ið landsstýrið setir sum lægsta mark, og at tey, áðrenn sjálvuppgávufreistin er úti, skulu senda líkningarvaldinum rakstrarroknskap og fíggjarstøðu, ið er gjørd úr hesum tilfari. Roknskapir við tilhoyrandi skjølum skulu goymast í minst 5 ár aftaná, at viðkomandi roknskaparár er endað."

20) § 149 verður orðað soleiðis:

"Hann, sum ikki ger eftir fyriskipan, sum er fráboðað av landsstýrinum sambært § 103, stk. 1 og stk. 2 um at føra roknskap, ella ger seg sekan í stórari ógreiðslu við at føra slíkan roknskap, ella við at goyma henda við tilhoyrandi skjølum, sum ásett verða í krøvunum, kann verða dømdur í sekt."

21) Í § 154, stk. 3 verður orðingin: "97% av" strikað.

§ 2.

Henda løgtingslóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Stk. 2.** Broytingarnar nr. 1-3 og 5-16 fáa gildi 1. januar 1993.

**Stk. 3.** Gjørdar avsetingar til rakstrargrunn skulu í seinasta lagi fimta inntøkuárið aftan á avsetingarárið inntøkuførast aftur.

**Stk. 4.** Broyting nr. 21 fær gildi frá og við inntøkuárinum 1992.

**Stk. 5.** Broytingin í nr. 5 fevnir ikki um gjørdar avtalur um bygging á førikke i den øvrige lovgivning er foreskrevet bogføringspligt, skal være pligtige at føre boghold, der opfylder de af landsstyret fastsatte mindstekrav samt, inden udløbet af fristen for indgivelse af selvangivelse, til ligningsmyndigheden at indsende driftsregnskab og status udarbejdet på grundlag af dette materiale. Regnskab med tilhørende bilag skal opbevares i mindst 5 år efter udløbet af det pågældende regnskabsår."

20) § 149 affattes således:

"Med bøde kan den straffes, som undlader at føre regnskab, som det efter bestemmelserne af landsstyret i medfør af § 103, stk. 1 og stk. 2 påhviler ham at føre, eller som gør sig skyldig i grove uordener med hensyn til førelse af sådant regnskab eller ved den i bestemmelsen foreskrevne opbevaring af dette med tilhørende bilag."

21) I § 154, stk. 3 udgår ordene: "97% af".

§ 2.

Denne lagtingslov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

**Stk. 2.** Ændringerne nr. 1 - 3 og 5-16 træder i kraft 1. januar 1993.

**Stk. 3.** Foretagne henlæggelser til driftsfond skal indtægtsføres senest femte indkomstår efter henlæggelsesåret.

**Stk. 4.** Ændring nr. 21 træder i kraft fra og med indtægtsåret 1992.

**Stk. 5.** Indgåede aftaler om bygning på færøske skibsværfter, der er indgået

oyskum skipasmiðjum í áliti til óbroyttar fortreytir, men verða hesar framhaldandi skattaðar sambært prinsippinum og prosentsatsinum í reglunum í løgtingslóg nr. 4 frá 26. mars 1953 um inntøkuskatt av rentum av innistandandi peningi í føroyskum bankum og sparikassum.

i tillid til uændrede forudsætninger, omfattes ikke af ændring nr. 5, men skal fremover fortsat beskattes i henhold til principperne og procentsatserne i lagtingslov nr. 4 af 26. marts 1953 om indtægtsskat af renter af indestående i færøske pengeinstitutter og sparekasser.

**Viðmerkingar:**

*Felagsviðmerkingar til løgtingsmálini: nr. 35/1992: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt,*

**nr. 36/1992:** Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan,
**nr. 37/1992:** Broyting í løgtingslóg um rentuskatt,
**nr. 38/1992:** Løgtingslóg um eykaskatt til landskassan,
**nr. 39/1992:** Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fløgugrunnar.
**nr. 40/1992:** Avtøka av løgtingslóg um gjaldan úr landskassanum til kommunurnar í mun til talið á pensjónistum v.m.

**Lønmóttakarar:**

Fyriliggjandi uppskot landsstýrisins, sum nevnd eru omanfyri, eru ein framhaldandi liður í tí byrjaðu umlagan av okkara skattaskipan fyri persónligar skattgjaldarar til eina bruttoskattaskipan, har skattafrádráttirnir koma at falla burtur so við og við.

Í tráð við hetta endamál verður í broytingunum skotið upp at seta ymiskar frádráttir fyri persónligar skattgjaldarar úr gildi, samstundis sum skattatrýstið verður lækkað, við at galdandi skattastigi verður nakað umlagaður.

Talan er í hesum føri um at seta reglurnar um persónsfrádrátt, løntakarafrádrátt og ferðafrádrátt úr gildi.

Tá endamálið við broytingunum er eitt arbeiði fram í móti eini bruttoskattaskipan, verða samstundis gjørdar broytingar, sum skulu forða fyri, at lønmóttakarar á annan hátt kunnu fáa frádrátt fyri møguligar rakstrarútreiðslur.

Harumframt verður skotið upp at seta rentufrádráttin úr 42% niður í 40%.

Í staðin fyri hesar frádráttir verður skattastigin broyttur á tann hátt, at landsskattur ikki verður roknaður av skattskyldugari inntøku frá 0 til 22.500 kr., og samsvarar hetta soleiðis við at fáa ein frádrátt í skattskyldugu inntøkuni upp á

22.500 kr. Síðan verður sjálvur prosentsatsurin fyri landsskattin á teim ymisku trinunum umskipaður, og inntøkumarkini verða eisini broytt.

Í kommunuskattinum verður skotið upp, at upphæddin, ið kommunuskattur ikki skal roknast av, verður upp á 12.000 kr. Tað verður sostatt talan um ymiskar upphæddir, sum landsskatturin og kommunuskatturin verða álíknaðir av, men tann skattskylduga inntøkan í sjálvum sær verður tann sama. Mett verður neyðugt at hava henda munin í "botnfrádrátti" millum land og kommunu, so kommunurnar ikki fara at bera ein lutfalsliga ov stóran part av skattaumleggingini.

Ætlanin við umleggingini av persónsskattinum er upp á longri sikt eisini at fáa beinleiðis skattatrýstið at lækka. Umleggingin av skattastiganum førir eisini isolerað sæð eina skattalækking við sær fyri flest allar lønmóttakarar. Men ásannandi, at tíðin ikki er til skattalækkingar generelt, verður samstundis útskrivaður ein eykaskattur til landskassan fyri inntøku frá og við 140.000 kr.

Eykaskatturin verður ásettur at galda fyri inntøkuárið 1993 og verður ásettur til 3% av skattskyldugari inntøku frá 140.000 til 220.000 kr. og 4% av skattskyldugari inntøku frá 220.000 kr. til 300.000 kr. og 5,5 % av skattskyldugari inntøku omanfyri 300.000 kr.

Við løgtingslóg nr. 73 frá 12.juni 1990 varð broyting gjørd í skattalógini viðvíkjandi skattligu viðgerðini av fólkapensjónistum og persónum, sum fáa framskundaða fólkapensjón, avlamis- og einkjupensjón og persónum, sum fáa hjálp eftir § 13 í forsorgarlógini.

Fyri pensjónistar varð fólkapensjónsgrunduppháddin gjørd skattafrí.

Hjá persónum, sum fáa framskundaða fólkapensjón, avlamis- og einkjupensjón ella hjálp eftir § 13 í forsorgarlógini, var almannaveitingin skattskyldug, men fyri skattliga at javnstilla hesi við fólkapensjónistar, fingu hesi í staðin ein frádrátt í skattskyldugu inntøkuni svarandi til fólkapensjónsgrunduppháddina.

Hetta merkir eitt nú, at skattskyldug inntøka út yvir grunduppháddina verður lagaliga skattað, tí grunduppháddin ikki telur við í progressivu skattingini, og at persónarnir við hesi inntøku hava rætt til løntakarafrádrátt og persónsfrádrátt.

Samstundis varð løgtingslóg nr.11 frá 3.oktober 1988 um serviðbót til ávísar pensjónistar sett úr gildi, og ásetingarlógin varð broytt, so tann hækkaði persónsfrádrátturin til pensjónistar fall burtur, og ístaðin fingu pensjónistar tann vanliga persónsfrádráttin.

Hendan umlegging av skattingini av pensjónistum v.m. kostaði uml. 33 mió. kr. Av hesum misti landskassin uml. eina hálva mió. kr. og kommunurnar mistu umleið 32 mió.kr. og kirkjuskatturin minkaði eisini við umleið eini hálvari mió. kr.

Fyri at kommunurnar ikki skuldu missa so stóra skattainntøku av hesum, varð samtykt løgtingslóg nr. 67 frá 12. juni 1990 um gjaldan úr landskassanum til kommunurnar í mun til talið á pensjónistum v.m.

Lógin hevur við sær, at landskassin fyri at endurrinda kommununum fyri ta mistu skattainntøkuna skal gjalda kommununum eina upphædd upp á 4.500 kr. fyri hvønn persón í tí einstøku kommununi, ið fær fólkapensjón, framskundaða fólkapensjón, avlamis- og einkjupensjón ella hjálp eftir § 13 í forsorgarlógini.

Landskassin endurrindar tí í løtuni árliga umleið 30 mió.kr til kommunumar fyri at halda fólkapensjónsgrunduppheddina og aðrar almannaveitingar, sum í § 33 nr. 13 skattliga eru javnsettar við fólkapensjón, skattafríar.

Landsstýrið hevur sett fram uppskot um eykaskatt til landskassan fyri 1993, samstundis sum skattastigin, galdandi fyri allar persónar undir fullari skattskyldu eftir reglunum í § 1 í skattalógini, verður broyttur sum omanfyri nevnt. Landsstýrið metir, at neyðugt er, at tað verða so nógvir skattgjaldarar sum gjørligt um at bera ta skattabyrðu, sum tíðin krevur, fyri at byrðan hjá tí einstaka ikki verður órímiliga stór. Veruleikin í dag er, at nógvir skattgjaldarar eru fyri inntøkumissi, eitt nú vegna arbeiðsloysi og annars generelt minkandi arbeiðsinntøku vegna minking í arbeiðstímum, eisini hjá teimum, sum í dag hava arbeiði. Hóast lítla inntøku, so eru hesir persónar undirlagdir skattskyldu á vanligan hátt uttan mun til, um inntøkuupphæddin er omanfyri ella niðanfyri eitt nú grunduppheddina í fólkapensjónini.

Samanumtikið metir Landsstýrið, at neyðugt er at broyta verandi skattastøðu hjá pensjónistum og øðrum, ið fáa almannaveitingar, so at fólkapensjónsgrunduppheddin aftur gerst skattskyldug inntøka (tó við eini serstøðu skattliga), og tann serligi frádrátturin í § 33 nr.13 í skattalógini verður settur úr gildi.

Í staðin koma hesi undir vanliga skattskyldu. Hesi fáa tá, sum øll onnur undir fullari skattskyldu, í skattskyldugu inntøkuni ein "botnfrádrátt" upp á 22.500 kr. í landsskattastiganum og 12.000 kr. í skattskyldugu inntøkuni, tá kommunuskatturin verður útroknaður.

Fyri hesar persónar verður tó skotið upp, at innførdur verður ein serligur frádráttur, ein landsskattafrádráttur, upp á 8.300 kr. fyri stakar persónar og 5.500 kr. fyri giftar persónar.

Eftir hesum reglum kemur ein pensjónistur, hóast grunduppheddin verður tald upp í skattskyldugu inntøkuna, ikki at skula gjalda skatt av sjálvari fólkapensjónsgrunduppheddini, men skattskyldug inntøka út yvir grunduppheddina verður skattað á vanligan hátt eftir tí progressiva skattastiganum, og merkir hetta í mun til verandi skipan, at inntøka út yvir grunduppheddina verður skattað nakað harðari enn í dag. (Útroknað dømi um ávirkanina av broytingini er hjáløgd sum fylgiskjøl.)

Støðan hjá persónum, sum fáa framskundaða fólkapensjón, avlamis-og einkjupensjón ella hjálp eftir § 13 í forsorgarlógini, verður broytt á líknandi hátt.

Kommununar fáa á hendan hátt umleið 32 mió. kr. inn aftur av tí annars mistu skattainntøkuni.

Grundarlag er tá ikki longur fyri at landskassin endurrindar kommununum fyri mista inntøku, sum omanfyri greitt frá. Skotið verður tí upp at seta løgtingslóg nr. 67 frá 12. juni 1990 úr gildi.

Positiva ávirkanin av umleggingini av skattastiganum kemur fyrst og fremst at merkjast hjá teim persónum, sum í 1993 koma at hava lág- og meðalinntøkumar. Men má hetta sjálvsagt eisini síggjast í relatión til, at rentufrádrátturin minkar við 2%, og fer lækkingin av rentufrádráttinum tí í flestu førum at verða avgerandi fyri, hvussu einstaklingurin fer at merkja umleggingina av skattastiganum.

Vegna útskrivaða eykaskattin fyri 1993 koma allar inntøkur frá umleið 140.000 kr. og uppeftir at fáa eina skattahækking.

Inntøkuskatturin verður við teim uppskotnu broytingunum í 1993 mettur at geva 722 mió.kr. í inntøku til landskassan, meðan eykaskatturin verður mettur at geva 46 mió.kr. í skatti til landskassan.

Roknað er tá við eini niðurgongd í skattainntøkuni upp á 11% sæð í mun til fyribils skattatølini fyri 1992.

Viðvíkjandi løntakarum, sum sigla við skipum, skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni, verður fyri teirra viðkomandi, sum eru undir avmarkaðari skattskyldu, innførdur ein bruttoskattur upp á 35%.

**Partafelagsskattur:**

Harumframt eru í uppskotunum munandi broytingar av verandi lógarreglum um partafelagsskatt.

Broytingarnar bera í høvuðsheitum við sær, at skatturin fyri tey partafeløg og lutafeløg, ið hava 300.000 kr. ella meira í partapeningi ella lutapeningi, verður niðursettur frá 49% til 22%. Samstundis verður ásetingin í skattalógini um rakstrargrunn avtikin, og møguleikarnir til at avseta til íløgugrunn verða avtiknir. Skotið verður eisini upp at áseta vinningsbýtisskattin til 35%.

Feløg - serliga partafeløg - hava í fleiri ár havt møguleika at seta av í íløgugrunn og rakstrargrunn og harvið økt um sína konsolidering. Hetta hevur tó verið tíðaravmarkað, og við hvørt hevur tað skattliga í hesum gjørt, at disponeringin ikki altíð hevur verið væl umhugsað. Í 1991 stóðu soleiðis í íløgugrunni á Føroya Gjaldstovu umleið 160 mió kr. Landsstýrið metir, at tað hevur víst seg, at tíðin er farin frá íløgugrunnaskipanini, tí eitt nú kann nevnast, at verandi íløgugrunnaskipan førir við sær, at vinnurekandi heldur velja at gera nýíløgur enn at gera umvælingar. Í hesum tíðum er hetta ikki positivt, tá hugsað verður um, at nýíløgur oftast eru útveganir av rakstrargøgnum úr útlondunum, meðan umvælingar eru ein "íløga", ið gevur arbeiði í Føroyum. Landsstýrið skjýtur tí upp, at broyta

lógina um íløgugrunnar soleiðis, at framyvir skal ikki verða gjørligt at seta i íløgugrunn, og skjýtur upp, at gjørdar avsetingar til íløgugrunnar frá og við tí roknskaparskeiði, ið endar í ella fellur saman við 1991, kunnu inntøkuførast eftir nærri ásettum reglum.

Vit hava - ikki minst í hesi tíð - men eisini í framtíðini, brúk fyri fyritøkum og feløgum, sum eru kappingarfør, sum vinna pening og sum hava stóran eginpening, sum er fortreytin fyri øktari framleiðslu, tryggum viðurskiftum og stabilum og fleiri arbeiðsplássum. Til at betra um hesar umstøður, verður mett neyðugt at lækka partafelags- og felagsskattin eins og í fleiri av okkara grannalondum, so vit har við kunnu bøta um okkara kappingarføri og konsolideringsmøguleikar. Landsstýrið metir, at tíðin fyri hesi umlegging av partafelags- og felagsskattinum júst er búgvin nú, tá land og kommunur lítlan og ongan partafelags- og felagsskatt fáa.

Gongdin í partafelagsskatti og felagsskatti er sum á niðanfyri vístu talvu:

| **Skattaár** | **1987** | **1988** | **1989** | **1990** | **1991** | **1992** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **1.000 kr.** | | | | | **(fyribils)** | **(mett)** |
| sk. inntøka: | 236.790 | 269.751 | 211.407 | 166.337 | | |
| skattur | -116.002 | 148.358 | 103.573 | 81.502 | 33.000 | 19.000 |

Sum hesi tøl vísa, er niðurgongdin í skattskyldugari inntøku hjá feløgum og harav fylgjandi skattur skjótt minkandi, og metir landsstýrið, at neyðugt er at gera tiltøk fyri at steðga hesi niðurgongd. Landsstýrið metir, at ein gongd leið er stigvíst at leggja skattingina av feløgum um, eitt nú sum her skotið upp við partafeløgum og lutafeløgum í ávísari støddi, fyri at skapa betri verkaumstøður hjá skattskyldugum feløgum.

Eftir uppskotnu broytingunum verður partafelagsskatturin hereftir soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| Partafelagsskattur | 22% | 22 % |
| Vinningsbýtisskattur | 35% av 78 | 27,3 % |
| | | 49,3 % |

Eftir verandi reglum er skatturin hesin:

| | | |
|---|---|---|
| Partafelagsskattur | | 49 % |
| Vinningsbýtisskattur | 20% av 51 | 10,2% |
| | | 59,2 % |

Avsetingar til íløgugrunn og rakstrargrunn kunnu tó í dag fáa skattatrýstið minkað við í mesta lagi 22% í eitt ávíst tíðarskeið. Hetta er tó bert ein útseting av skattinum í upp til 10 ár.

Nakrar av avsetingunum í rakstrargrunn og í fløgugrunn, sum eru gjørdar í teim árum, tá partafelagsskatturin var 49%, koma sambært uppskotinum undir lagaligari skatting, um tær skulu inntøkuførast í komandi árunu. Isolerað sæð kunnu skattainntøkurnar yvir eitt tíðarskeið minka nakað av hesum broytingum.

Men samanumtikið metir landsstýrið, at umleggingin av felagsskattinum, so sum skotið er upp, fer at føra við sær øktan áhuga frá útheiminum til at gera fløgur í Føroyum, so at vit á henda hátt fáa økt virksemi í landinum og harvið eisini nøkur nýggj arbeiðspláss. Í síðsta enda skuldi skattabroytingin tí kunna givið møguleikar fyri øktum skattainntøkum til land og kommunur.

Saman við hesum broytingum verður skattingin av rentuinntøkum, hvat skattskyldugum feløgum viðvíkur, eisini broytt, so at rentuinntøkan hjá hesum frá og við 1993 skal teljast upp í skattskyldugu inntøkuna hjá feløgunum, og ikki skattast eftir teim verandi serreglum viðvíkjandi rentuinntøkum av innistandandi í føroyskum peningastovnum og postgiro.

Sum eina fylgibroyting til hesar skattabroytingar metir landsstýrið tað neyðugt at fáa broytt galdandi partafelagslóg, so at partaeigaralán í framtíðini ikki verða loyvd. Í løtuni situr ein arbeiðsbólkur og arbeiðir við uppskoti til nýggja partafelagslóg, sum skal koma í staðin fyri galdandi partafelagslóg frá 1930, og í henni er ætlanin at seta bann fyri partaeigaralánum.

Eftir ætlan verður arbeiðsbólkurin liðugur við arbeiðið í ár.

Bann fyri partaeigaralánum verður mett neyðugt, nú tá partafelagsskatturin kemur niður á eitt so mikið lágt skattatrýst, sum her skotið upp, tí uttan hesa broyting kundu broytingarnar lætt havt við sær eina negativa ávirkan á tann hátt, at áhugin fyri at hava privat fíggjarviðurskifti sum millumverandi við partafelagið vildi vaksið. Hesin møguleikin má minimerast bæði við nevndu lógarbroyting og eisini við øktum eftirliti frá skattavaldsins síðu viðvíkjandi fríum ágóðum frá felag til leiðslu, høvuðspartaeigarar v.fl.

Miðað verður tí eftir at fáa nýggja partafelgslóg setta í gildi fyri Føroyar skjótast gjørligt.

Sum ein onnur fylgibroyting ætlar landsstýrið í næstu framtíð at seta fram uppskot til broyting av virðisbrævaskattalógini, so tað í framtíðini verður gjørdur ávísur skattligur munur á partabrævasølu hjá høvuðspartaeigarum í mun til aðrar partabrævaeigarar.

**Viðmerkingar til tær einstøku broytingarnar:**

**Viðv.løgtingslógini um íløgugrunnar:**

Møguleikin til at avseta til íløgugrunn verður settur úr gildi. Harvið verða møguleikarnir til framhaldandi avseting avtiknir, og síðstu avsetingar skulu sostatt verða gjørdar fyri avsetingarárið 1991. (Roknskaparskeið, sum fellur saman við ella endar í álmanakkaárinum 1991).

Frá og við teim roknskaparskeiðum, sum enda ella falla saman við álmanakkaárinum 1992, verður heimilað at inntøkuføra íløgugrunnar hóast vanliga nýtslufreistin upp á 10 ár ikki er liðin.

Um inntøkuføring av íløgugrunnum heilt ella partvíst verður gjørd í roknskapinum fyri roknskaparskeið, sum endar í ella fellur saman við 1992, so verður avsetta upphæddin útgoldin í trimum líka stórum pørtum yvir 1993, 1994 og 1995. Ynskist inntøkuføring heilt ella partvíst í roknskapi fyri 1993, so verður útgjaldingin gjørd í tveimum líka stórum pørtum í 1994 og 1995. Verður inntøkuføring heilt ella partvíst gjørt í roknskapi fyri 1994, verður frígevingin samlað í 1995, meðan restin av ikki nýttum ella inntøkuførdum íløgugrunnunum verður viðgjørd eftir vanligu reglunum í lógini. Útgjaldingin verður fyri hvørt árið aftan á 1. september.

Gjørdar avsetingar kunnu tó í nøkur ár framyvir verða nýttar til forskotsavskriving eftir verandi reglum. Galdandi 10 ára freist fyri nýtslu verður framhaldandi galdandi, so verða íløgugrunnar ikki nýttir til forskotsavskriving ella inntøkuførdir eftir reglunum í § 9 stk. 2 innan 10 ára freistin er liðin, verður tvungin inntøkuføring gjørd eftir verandi reglum í § 9 stk. 1 jfr. § 6.

**Viðv. lógini um landsskatt og kommunuskatt:**

Verandi § 1, nr. 6, ásetir, at persónur, sum er við føroyskum skipi uttan annars at vera skattskyldugur eftir hesi grein, gerst fult skattskyldugur í Føroyum, tá hesin í 12 mánaðir hevur verið minst 180 dagar samfeldar ella í skiftum í hesum starvi. Fulla skattskyldan fellur tó burtur, tá viðkomandi kann prógva, at hann er undir skattskyldu aðrastaðni eftir reglum, galdandi fyri búsett har.

Skotið verður upp at seta hesa áseting úr gildi, tá ikki er vanligt at gera fulla skattskyldu galdandi yvir fyri persóni, ið ikki hevur nakað persónligt tilknýti til eitt land, men bert eitt fíggjarligt tilknýti. Hesir persónar koma tá í staðin undir avmarkaða skattskyldu eftir reglunum í § 2.

Í nr. 6 verður so ásett, at persónur, sum er við føroyskum skipi, og sum hevur verið fult skattskyldugur í Føroyum eftir reglunum um bústað í Føroyum og dvøl í Føroyum, verður undir fullari skattskyldu. Tó so at fulla skattskyldan fellur burtur, tá persónurin kann prógva, at hann veruliga er búsitandi uttanlands og rindar skatt í øðrum landi, sum búsitandi har.

Metanin um, nær ein persónur er búsitandi uttanlands, má tá liggja í eini heildarmetan av teim subjektivu og fíggjarligu tilknýtunum hjá viðkomandi til ávikavist Føroyar og útland.

Fyri persónar undir FAS merkir henda broyting, at teir persónar, sum ikki eru fult skattskyldugir í Føroyum eftir reglunum í § 1, nr. 1-5, nú gerast avmarkað skattskyldugir til Føroyar eftir reglunum í § 2, samstundis sum ásetingarlógin

verður broytt, so at hesir persónar fáa eitt bruttoskattaprosent av A-inntøku, innvunnin av FAS skipi, upp á 35%. (Saman við 0,5% gjaldinum til arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin er hetta sostatt 35,5%). Viðmerkjast skal, at hava hesi aðra skattskylduga inntøku í Føroyum, verður henda skattað eftir reglunum í skattalógini og ásetingarlógini um 42% sum hjá øðrum persónum undir avmarkaðari skattskyldu, og um persónur fær dvøl ella bústað í Føroyum, gerst hann fult skattskyldugur á líknandi hátt sum aðrir tilflytarar.

Í § 2 verður galdandi áseting viðvíkjandi avmarkaðari skattskyldu vegna rentuinntøku úr Føroyum broytt til bert at hava gildi fyri persónar og deyðsbúgv.

Í § 3 verður innførd ein heimild til Føroya Landsstýri at áseta nærri reglur fyri veiting av skattafrælsi eftir ásetingunum í § 3.

Í § 25 verður gjørd ein prinsippbroyting, við at landsstýrið nú mælir til, at rentuinntøka, ið skattskyldug feløg, stovnar v.m. fáa av innistandandi í Føroyunum, skal viðgerast á líknandi hátt, sum rentuinntøka úr útlandinum, og harvið teljast við í skattskyldugu inntøkuna hjá felagnum.

Skattliga er hetta ein broyting, sum førir við sær, at rentuinntøkan frá at vera ein inntøka, sum varð hildin uttanfyri vanligu skattskyldugu inntøkuna hjá feløgunum, og skattað eftir serligum reglum, nú verður gjørd til ein partur av skattskyldugu inntøkuni. Hetta skuldi m.a. fört við sær, at vit fyri skattskyldug feløg fáa eitt breiðari skattagrundarlag, samstundis sum tær serligu reglurnar um mótrokning í § 33, nr. 1 a-c av rentuinntøku og rentuútreiðslu frá 1991 fyri skattskyldug feløg gerast óneyðugar, tá møguleikarnir fyri rentuspekulatión í vinnuligum rentum, hvat skattskyldugum feløgum viðvíkur, skuldu verið burtur. Mótrokningarreglurnar í § 33, nr. 1 verða tó tær somu, hvat vinnuligum rentuútreiðslum fyri sjálvstøðugt vinnurekandi viðvíkur.

Viðvíkjandi broytingini í § 29 verður víst til tær generellu viðmerkingarnar.

Í § 31 verður ásett, at løntakarar ikki hava frádráttarrætt fyri møguligar rakstrarútreiðslur, ið standast av at vinna A- inntøku og annars av inntøku, sum stendst av, at viðkomandi er í persónligari tænastu fyri onnur. Hetta verður mett neyðugt, nú frádráttarrætturin til løntakarafrádrátt í § 33, nr. 7 fellur burtur, fyri at ivaspurningar ikki eftirfylgjandi skulu stinga seg upp. Hetta samsvarar sostatt eisini við heildarætlanina fyri skattalógarbroytingarnar um at miða ímóti, at fáa innført eina bruttoskattaskipan í Føroyum.

Ásetingin í § 33, nr. 3 viðvíkjandi avseting til rakstrargrunn verður sett úr gildi. Inntøkuføringin av verandi rakstrargrunnum verður greidd sum higartil, og skulu avsettir rakstrargrunnar tí framhaldandi inntøkuførast í seinasta lagi fimta inntøkuárið aftan á avsetingarárið. Ásetingin er sett at fáa gildi 1. januar 1993 og kann tí ikki avsetast til rakstrargrunn fyri tey roknskaparskeið, ið enda ella falla saman við álmanakkaárinum 1992.

Heimildirnar í § 33 nr. 7 og 8 viðv. løntakarafrádráttinum, sum er ein frádráttur í inntøkuni og ferðafrádráttinum, sum eisini er ein frádráttur í inntøkuni, verða settar úr gildi. Tó verða ásetingarnar um frádrátt fyri tvinnandi húsarhald varðveittar, og verða nú innsettar sum nr. 6 í § 33.

Í § 46 verður ásett, at kommunuskattur ikki skal álíknast teim fyrstu 12.000 kr. av skattskyldugari inntøku.

§ 46 og § 46 a: Prosentsatsurin fyri rentufrádrátt í útroknaða kommunuskattinum verður her lækkaður frá verandi 14% til 13%.

Í § 47 verða stk. 2 og 3 viðvíkjandi flyting av ónýttum persónsfrádrátti í landsskattinum til kommunuskatt broytt í samsvar við, at persónsfrádrátturin í § 3 í ásetingarlógini er settur úr gildi, og ístaðin er innførdur ein serfrádráttur fyri pensjónistar og onnur, ið fáa almannaveitingar eftir ávísum reglum.

Í § 63 a verður neyvari útgreinað, at eisini tær lønarsamsýningar, sum verða rindaðar fyri tænastu umborð á skipi, sum eftir reglunum í § 2, stk. 1, litra j er at meta sum skip, skrásett við heimstaði í Føroyum, koma inn undir reglurnar um afturbering, um skipið annars lýkur skráseting artreytirnar í Føroysku Altjóða Skipaskrásetingini.

Broytingin í § 154 nr. 3 er ein broyting í lógarásetingunum fyrr í ár í samband við álegging av eykaskatti til landskassan fyri 1992. Samstundis sum lógin um eykaskatt varð sett í gildi, varð lógaráseting gjørd í skattalógini, sum skuldi áleggja D.I.S.-inntøkum ein eykaskatt fyri 1992. Hending lógaráseting er av føroysku og donsku skattamyndugleikunum viðgjørd í relatión til tvískattasáttmálan landanna millum og verður mett, at lógarásetingin kann føra til óneyðuga stórar trupulleikar í hesum samarbeiði, samstundis sum ivasamt er, um broytingin fer at geva nakrar eykainntøkur til landskassan.

Skotið verður tí upp at broyta lógarásetingingina soleiðis, at gamla orðingin verður innførd aftur. Hetta merkir við øðrum orðum, at eykaskatturin upp á 3% í 1992 fyri D.I.S. inntøku fellur burtur.

Viðvíkjandi umleggingini av rentuskattinum fyri skattskyldug feløg til ein part av skattskyldugu inntøkuni er gjørt tað undantak, at rentuinntøka av innistandandi í relatión til gjørdar avtalur um bygging á føroyskum skipasmiðjum, har ein týðandi partur av skipanini er bygdur upp eftir tí gomlu serføroysku skipanini viðv. rentuskatti, ikki skal ávirkast av broytingini, men framhaldandi skattast eftir reglunum og við prosentsatsi eftir løgtingslóg nr. 4 frá 26. mars 1953 um inntøkuskatt av rentum av innistandandi peningi í føroyskum bankum og sparikassum.

**Viðv. løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan:**

**Til § 1:** Verandi skattastigi verður her broyttur, bæði hvat prosentum og inntøkubólkum viðvíkur.

**Verandi skattastigi:**

Er inntøkan minni enn 30.000 kr. verða latin 20%
Er inntøkan men minni verður latið av og av

| kr. | enn. kr. | kr. | kr. | restini % |
|---|---|---|---|---|
| 30.000 | 50.000 | 6.000 | 30.000 | 26 |
| 50.000 | 100.000 | 11.200 | 50.000 | 31 |
| 100.000 | 150.000 | 26.700 | 100.000 | 31,5 |
| 150.000 | 200.000 | 42.450 | 150.000 | 34 |
| 200.000 | | 59.450 | 200.000 | 42 |

Skattastigin, sum skotin verður upp:
Er inntøkan minni enn 22.500 kr. verða latin 0%.
Er inntøkan men minni verður latið av og av

| kr. | enn kr. | kr. | kr. | restini % |
|---|---|---|---|---|
| 22.500 | 60.000 | 0 | 22.500 | 15 |
| 60.000 | 140.000 | 5.625 | 60.000 | 31 |
| 140.000 | 220.000 | 30.425 | 140.000 | 36 |
| 220.000 | 300.000 | 59.225 | 220.000 | 39 |
| 300.000 | | 90.425 | 300.000 | 43 |

**Til § 3:** Persónsfrádrátturin, sum verður veittur sum frádráttur í útroknaða landsskattinum, og sum í løtuni er upp á 4.500 kr., verður her settur úr gildi fyri allar persónar, t.v.s. eisini tann hækkaði persónsfrádrátturin fyri lesandi.

Men samstundis verður heimilaður ein serfrádráttur fyri pensjónistar v.m. sum skal tryggja, at fólkapensjónistar framhaldandi ikki skulu gjalda skatt av sjálvari grunduppheddini, men í staðin koma at gjalda meir av inntøku yvir grunduppheddina sæð í mun til verandi skattaskipan.

**Til § 4 og 4a:** Prosentsatsurin fyri frádrátt av rentuinntøku í útroknaða landsskattinum verður her niðursettur frá teim verandi 28% til 27%.

**§ 5,** sum ásetir felagsskattin, verður broytt frá 1.januar 1993 til at hava ymisk skattaprosent fyri partafeløg og lutafeløg, sum hava ávikavist meir ella minni partapening enn 300.000.kr.

Partafeløg og lutafeløg, sum við endan av tí roknskaparskeiði, sum fellur saman við ella endar í 1992, hava partapening ella lutapening minni enn 300.000 kr. og somuleiðis onnur skattskyldug feløg, fara framhaldandi at skula gjalda 49% í skatti, meðan tey feløg, sum hava partapening ella lutapening upp á 300.000 kr. ella meir, fara at gjalda 22%. Hendan skipan er ætlað sum ein fyribilsskipan, til

arbeiðið við at endurskoða partafelagslóggávuna er liðugt, tí fyrst tá kann sigast við vissu, hvørji krøv fara at verða sett til støddina av partapeningi í samband við stovnan av partafeløgum. Ætlanin er tá samstundis at fáa mett um skattingina av skattskyldugum feløgum av nýggjum.

Broytingarnar eru settar at fáa gildi 1. januar 1993.

Fyri at tey feløg, sum hava brotið roknskaparskeið og hvørs roknskaparskeið tí longu er endað í 1992, verður fyri álíkning av teim roknskaparskeiðum, sum enda í ella fella saman við 1992, gjørt tað frávik, at krøvini verða sett í mun til partapening ella lutapening pr. 31.12.1992 í staðin fyri endan av roknskaparskeiðnum hjá hvørjum felag sær. Hetta verður mett neyðugt, so feløgini longu nú kunnu tillaga seg teim broyttu reglunum. Feløgini skulu tá sjálvi í samband við innlatan av sjálvuppgávu lata skattavaldinum skjalprógv og váttan fyri, at partapeningur ella lutapeningur er broyttur frá enda roknskaparársins til 31.12.1992.

**Viðvíkjandi løgtingslóg um eykaskatt til landskassan:**

Fyri inntøkuárið 1993 verður útskrivaður ein eykaskattur til landskassan.

Lógin umfatar persónligar skattgjaldarar, ið eru skattskyldugir eftir § 1 í skattalógini, og er galdandi fyri inntøkur frá 140.000 kr. og hægri.

Tað verða áløgd 3% í eykaskatti á inntøku frá 140.000 kr til 220.000 kr, 4 % á skattskylduga inntøku frá 220.000 til 300.000 og 5,5 % á skattskylduga inntøku frá 300.000 kr. og hægri.

**Við eykaskatti fer skattastigin fyri landsskatt í 1993 at síggja solciðis út:**

Er inntøkan minni enn 22.500 kr. verða latin 0%.

| Er inntøkan kr. | men minni enn kr. | verður latið av kr, | og av kr. | restini % |
|---|---|---|---|---|
| 22.500 | 60.000 | 0 | 22.500 | 15 |
| 60.000 | 140.000 | 5.625 | 60.000 | 31 |
| 140.000 | 220.000 | 30.425 | 140.000 | 39 |
| 220.000 | 300.000 | 61.625 | 220.000 | 43 |
| 300.000 | | 96.025 | 300.000 | 48,5 |

Lógin um eykaskatt er galdandi fyri inntøkuárið 1993.

Sum fylgiskjøl verða hjálagdar útrokningar av ávirkanini av skattabroytingunum fyri persónligar skattgjaldarar bæði við og uttan eykaskatt.

# Álit

í

*løgtingsmáli nr. 35/1992: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 13. november 1992 og eftir 1. viðgerð 25. november 1992 beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið. Undir viðgerðini hevur nevndin hildið fund við Jógvan Sundstein, landsstýrismann í skattamálum og við umboð fyri Toll- og Skattstovu Føroya.

Undir viðgerðini er komið fram, at nevndin ikki er samd um broytingarnar í uppskotinum frá landsstýrinum, og hevur nevndin tískil býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Vilhlem Johannesen, Jørgen Niclasen og Eyðun Viderø) fegnast um, at fleiri av broytingunum eru stig á vegnum til eina bruttoskattaskipan. T.d. vísir meirilutin á, at vit sambært uppskotinum fáa ein fastan botnfrádrátt í bæði landsskattinum og kommunuskattinum og at frádráttarreglurnar verða broyttar soleiðis, at frádráttirnir stigvíst ella beinanvegin falla burtur.

Endamálið við umleggingini av skatting av lønmóttakarum er at leggja lunnar undir eina bruttoskattaskipan, sum nógv er tosað um seinastu árini. Bruttoskattaskipan kann ikki setast í gildi eftir einum degi, og mælir meirilutin til broyting og umlegging ávegis einum bruttoskatti.

Við bruttoskatti eru eingir skattafrádráttir, men ístaðin eitt stórt botnfrádrag. Í hesum uppskoti eru persónsfrádrátturin, løntakarafrádrátturin og ferðafrádrátturin tiknir burtur, rentufrádrátturin er skotin upp at lækka úr 42% niður í 40% og í staðin fyri hetta at seta eitt botnfrádrag fyri allar løntakarar upp á 22.500 kr. í landsskattinum og 12.000 kr. í kommunuskattinum. Endamálið er so við og við at fáa rentufrádráttin burtur og at hækka botnfrádragið samstundis.

Nú er skotið upp broyting fyri næsta ár, og tað liggur í hesum, at broytingar skulu leggjast fyri løgtingið ár um ár, til renturfrádrátturin er burtur. Hetta er ein ógvuliga tungur arbeiðsháttur fyri løgtingið, har fólk, sum ætla at byggja, ikki rættiliga vita, hvussu verður við renturfrádráttinum.

Meirilutin heldur, at lóg átti at verið útvegað, sum gjørdi greitt, hvussu henda umlegging kemur at henda, raðfest við broytingunum at koma í gildi ár um ár. Tíðarskeiðið er 10-15 ár ella meir, har vit so líðandi minka rentufrádráttin og hækka botnfrádráttin samstundis.

Um vit t.d. søgdu, at rentufrádrátturin kemur at minka 2,7% um árið í 15 ár, so hevði ein húsaeigari, har húsini standa í 800.000 kr. komið at mist umleið 2.000 kr. í rentufrádrátti tað fyrsta árið og so líðandi, sum lánið og renturnar minkaðu,

hevði tapið verið minni og minni. Minkingin í rentrufrádráttinum má sjálvsagt býtast millum land og kommunu, og rímiligt hevði verið at býtt eftir verandi lutfalli t.v.s. 0,9% til kommunur og 1,8% í landskattinum. So kundi verið sagt, at botnfrádrátturin í landsskattinum hækkar við 3000 kr. í 1994, við 2.800 kr. í 1995, við 2.600 kr. í 1996, til botnfrádrátturin fimtanda árið vaks við 200 kr. Tá var botnfrádrátturin í landsskattinum komin upp á 45.000 kr.. Somuleiðis má so botnfrádragið í kommunuskattinum hækka í rímiligan mun. Missurin hjá hesum húsaeigara hevði verið avmarkaður og tey, ið bygdu hús í hesum áramáli, vistu, hvussu skipanin kom at verða árini framyvir. Hetta eigur at verða lógarfest í staðin fyri eina nýggja lógarbroyting hvørt ár. Nú eru í hesum dømi nøkur tøl á, men læsir meirilutin seg ikki fastan í tølini og áramálið. Tey eru bert fyri betur at greiða frá týdninginum aftan niðanfyri nevnda uppskot til samtyktar.

Umráðandi er at gera greiðar framtíðarætlanir, hvussu og nær vit koma til ein bruttoskatt.

Samsvarandi hesum setir meirilutin (Vilhelm Johannesen, Eyðun Viderø og Jørgen Niclasen) fram soljóðandi:

## Uppskot

## til

## samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at leggja fyri løgtingið lógaruppskot við raðfesting av ætlaðu broytingunum í skattalógini fyri hvørt árið, so gjørt verður greitt, hvussu umleggingin frá núgaldandi frádráttum til hækkandi botnfrádag verður gjørd.

Minnilutin (Finnbogi Arge) førir fram: Tann parturin av samgonguni, sum hevur búskapar- og skattamál um hendi, lovaði veljarum sínum skattalætta undan valinum í 1990. Men síðani hesin flokkur kom út í Tinganes saman við Javnaðarflokkinum, hevur hann støðugt lagt fleiri og fleiri skattabyrðar á okkara fólk.

Vit hava longu fingið eykaskatt, hægri rentuskatt, samhaldsfasta og arbeiðsloysistryggingargjald. Men enn fleiri skattahækkingar eru á veg. Í tinginum liggja nú nýggjar lógir um hækkaðan rentuskatt, nýggjan eykaskatt, hægri arvaavgjald, skattur til pensionistar og meirvirðisgjald upp á 23% fyri vørur og tænastur. Tað frættist, at nýggjur lønarskattur eisini skal leggjast oman á øll hini tiltøkini, samstundis sum frádráttarmøguleikarnir eru skerdir og ógvusligir lønarniðurskurðir skulu fremjast í komandi ári.

Tað man vera eitt søguligt eindømi, at eitt fólk fær álagt so mangar skattahækkingar upp á so stutta tíð - serliga av einum flokki, sum hevur fingið veljaranna stuðul til at fremja sítt høvuðsmál: at lækka skattirnar. Sjálvsagt er mark

fyri, hvat borgarar landsins lata sær lynda, hetta veit Fólkaflokkurin, og tí hevur hann hesaferð loyst trúvirðisspurningin á ein heldur øðrvísi hátt enn seinast.

Heldur enn at leggja uppskot fram um skattahækking hevur avvarðandi floksmyndugleiki valt eina aðra og snildari leið at ganga: flokkurin leggur fram tvey uppskot! Fyrst eitt høvuðsuppskot við einum lægri skattastiga enn frammanundan, og síðani eitt hjáuppskot við eykaskatti.

Samanlagt geva hesi uppskot hægri skattabyrðu, men við at føra fram, at eykaskatturin bert er galdandi í eitt avmarkað tíðarskeið, stendur møguleikin opin at fara út til veljaramar aftan á og siga, at flokkurin hevur lækkað skattastigan - hóast tað øvugta er hent. Við búskaparútlitunum í huga, er eingin ivi um, at eykaskatturin fær ein permanentan karakter.

Við hesum afturvendandi eykaskatti, saman við arbeiðsloysistryggingargjaldi, samhaldsfasta og øðrum nýggjum byrðum, hevur Fólkaflokkurin megnað at brotið søguliga 50% markið og hevur fyribils lagt hægsta skattatrýst upp á umleið 60%, men gongdin bendir á, at hetta høga skattatrýst skjótt verður enn hægri. Undirsjóvartunnlar og aðrar fløgur skulu jú rindast onkursvegna.

Tann avgerandi spurningurin er, um tann føroyski borgarin knógvar undan byrðuni, nú so nógv verður lagt oman á - og so brádliga. Sambandsflokkurin óttast fyri, at tey verða mong, sum fara at hoykna. Og fleiri, sum høvdu megnað at borið okið, fara rætt og slætt at tveita byrðuna frá sær, av tí at støðan gerst so høpisleys, at tey eins væl kunnu geva seg innundir teir almennu hjálparveitingarnar.

Minnilutin metir, at avtøkan av ferðafrádrátti fær óhepnar avleiðingar fyri tey, sum hava langa leið til arbeiðis. Minnilutin tekur ikki undir við at lækka rentufrádráttin úr 42% til 40% og góðtekur heldur ikki, at pensionistarnir verða verri fyri av tí, at inntøka útyvir grunduppháeddina nú skal skattast progresivt beinanvegin. Minnilutin kann heldur ikki taka undir við eykaskattinum. Tær 46 mió. krónurnar, sum her er talan um, kundu lættliga verið fingnar til vega við at skorið fløgurnar í óproduktiv endamál niður. Víst verður í hesum sambandi til minnilutaálit Sambandsfloksins í løgtingsmáli nr. 38/1992.

Tann einasti parturin av lógaruppskotinum, sum minnilutin kann taka undir við, eru broytingarnar í partafelagsskattinum í samband við avtøku av fløgugrunnaskipanini. Men rentuskatturin hjá partafeløgum átti ikki at verði hækkaður til 22%, tí stórur vandi verður nú fyri, at tey fáu vælkonsolideraðu feløgini, sum eftir eru, flyta sítt innistandandi í føroyskum bankum av landinum, t.d. til danskar statsobligatiónir.

Minnilutin (Lasse Klein) førir fram, at sera trupult er at fáa eyga á nakra miðvísa ætlan, tá talan er um skattapolitikk landsstýrisins.

Tað verður givið við aðrari hondini og tikið innaftur við hinari í so stóran mun, at trupult verður hjá fólki at hava álit á, at júst hesi tiltøk fara at hjálpa.

Royndirnar, sum eru gjørdar frammanundan, bera týðuligt prógv um, at lopið verður um, har garðurin er lægstur, og soleiðis er eisini við øllum teimum uppskotum, sum í dag eru til viðgerðar.

Tað byrjaði við bundnu uppsparingini, tollhækkingum, avtøku av prístalsviðgerð av lønum, skattahækkingar, skerdan barnafrádrátt, skerdan rentufrádrátt, gjald til arbeiðsloysistrygging, gjald til samhaldsfasta, hækkað tænastugjøld á nærum øllum økjum, hækkað arvaavgjøld, hægri rentuskatt, MVG-gjald úr 20% upp í 23% og upptóku milliardir í almennari lántøku, og hava nú loksins eisini tikið stig til at skerja inntøkumøguleikarnar hjá teimum gomlu.

Øll hesi tiltøk høvdu og hava til endamáls at bøta um gjaldføri landskassans og vit mugu spyrja okkum sjálvi, hevur tað hjálpt? Svarið er heilt einfalt nei.

Sambært lógaruppskotinum lækkar rentufrádrátturin úr 42% niður í 40%. Minnilutin (Lasse Klein) tekur ikki undir við at lækka rentufrádráttin. Alt í alt er hetta stig fyri stig at máa støði í tinginum - at tað skal verða møguligt at ognast egnan bústað.

Minnilutin (Lasse Klein) vísir á, at saman við sparingum, sum fara fram á Bygdaleiðum og Strandferðsluni, fer tað at gerast munandi dýrari hjá fólki at ferðast millum heim og arbeiðspláss, og nú ferðafrádrátturin verður avtikin, verður hetta ein dyggur smeitur hjá fólki, sum hava langa farleið til arbeiðis, og tí kann minnilutin ikki taka undir við, at ferðafrádrátturin verður avtikin.

Minnilutin kann heldur ikki taka undir við, at frádrátturin fyri telefonútreiðslur hjá langfarafiskimonnum verður avtikin, og vísir í hesum sambandi á frágreiðingina hjá Føroya Fiskimannafelag.

Yvir bert stutt tíðarskeið eru byrðarnar hjá fólki vorðnar nógv tyngri, bæði tá talan er um persónligan skatt, og tá talan er um onnur almenn gjøld, og mark er fyri, hvussu nógv tað ber til at leggja á herðarnar á fólki, nú skattahámarkið er farið upp um tað, sum kallast kann verða rímuligt.

Ið hvussu er kunnu vit staðfesta, at hetta er ikki í tráð við tað, sum Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin góvu lyfti um undan valinum 1990, tá ið hesir báðir flokkarnir góvu lyfti um skattalætta og arbeiði til allar vinnuførar hendur.

Minnilutin (Lasse Klein) er sannførdur um, at tað verða mong, sum ikki fara at klára at bera byrðarnar, sum lagdar verða oman á tey, og tí verða tað helst mong, sum fara at geva skarvin yvir, júst tí at støðan gerst alt ov vónleys, og tí kann vandi verða fyri, at alt fleiri velja at rúma av landinum, ella lata seg skráseta sum almannaklientar.

Minnilutin vísti á undir viðgerðini, at hann kann taka undir við tí partinum av lógaruppskotinum, sum snúði seg um partafelagsskattin í samband við avtøku av íløgugrunnaskipanini. Men samstundis varð víst á vandan við at hækka rentuskattin hjá partafeløgum upp til 22%, og at nógvur peningur hjá fyritøkum, sum eru væl fyri, verður fluttur av landinum.

Minnilutin (Lasse Klein) vísir á, at endamálið hjá Javnaðarflokkinum og Fólkaflokkinum at kasta saman í samgongu hevur verið heilt greitt frá byrjan av, nevniliga at sleppa í samgongu, og at varðveita sín egnu áhugamál í størst møguligan mun.

Endamálið hjá báðum flokkunum hevur prinsipielt tann týdning, at seta teirra egna hugsjónarstøði fram um áhugamálini hjá heildini. Rákið móti einaræði er so at siga lagt inn í teirra hugmynd av, hvussu eitt samfelag skal rekast. Har sosialisma ella kapitalisma, sum hesi báðir flokkar umboða, veruliga hava fest røtur, valdar trongskygni, ófrælsi og kúgan, og er tað nakað, sum øll hesi uppskot umboða, so er tað trongskygni, og er tað nakað, sum tiltøk samgongunnar umboða, so er tað ófrælsi.

At seta sær fyri at røkja heildaráhugamál er torført, serstakliga tá hugsað verður um sráhugamálini høgrumegin og vinstrumegin í føroyskum politikki, sum Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin umboða. Ikki altíð gongst eftir vild, men hetta er einasta gongda leiðin, sum førir til menniskjaligt rættvísi, og tað eru hesi rættvísiskrøv, sum Sjálvstýrisflokkurin ferð eftir ferð hevur peikað á.

## Broytingaruppskot

í

*løgtingsmáli nr. 35/1992: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.*

Skattanevndin setir fram soljóðandi broytingar til uppskot landsstýrisins:

Í § 2, stk. 2 verður skoytt uppí:

"Tó verða broytingarnar í nr. 10 viðvíkjandi § 33, nr. 1a), 1b) og 1c) fyri felløg, har roknskaparskeiðið gongur um ársskiftið 1992/93, bert at galda viðvíkjandi rentuinntøkum og rentuútreiðslum fyri tann part av roknskaparskeiðinum, sum er í 1993, meðan galdandi reglur verða at nýta viðvíkjandi rentuinntøkunum og rentuútreiðslunum fyri tann part av roknskaparskeiðinum, sum er í álmanakkaárinum 1992."

I § 2, stk. 2 tilføjes:

"Dog kommer ændringerne i nr. 10 vedrørende § 33, nr. 1a), 1b) og 1c) for de selskabers vedkommende, der har en regneskabsperiode, der strækker sig over årsskiftet 1992/93, kun at have virkning for renteindtægter og renteudgifter, der vedrører den del af regnskabsperioden, der er i 1993, medens gældende regler fortsat har virkning for de renteindtægter og renteudgifter, der vedrører den del af regnskabsperioden, der er i kalenderåret 1992."

# 36. Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.*

*lagtingslov om ændring i lagtingslov om fastsættelse af skat til landskassen.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Vísandi til § 54 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður skattur teirra, ið nevnd eru í § 1, nr. 1-6 og § 2, stk. 1, litra d, e og f í somu lóg, til landskassan ásettur soleiðis:
Er inntøkan minni enn 22.500 kr., verður latið 0%

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 87 af 1. september 1983 om fastsættelse af skat til landskassen med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) § 1, stk. 1 affattes således:
"Under henvisning til § 54 i lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer udskrives skatter for den, der er omhandlet i § 1, nr. 1-6 og § 2, stk. 1, litra d, e og f i samme lov, til landskassen således:
Er indtægten mindre end 22.500 kr. erlægges 0%.

| Er inntøkan / Er indtægten | men minni enn / men mindre end | verður latið / erlægges | av / af | og av restini / og af resten |
|---|---|---|---|---|
| **kr.** | **kr.** | **kr.** | **kr.** | **%** |
| 22.500 | 50.000 | 0 | 22.500 | 15% |
| 60.000 | 140.000 | 5.625 | 60.000 | 31% |
| 140.000 | 220.000 | 30.425 | 140.000 | 36% |
| 300.000 | | 90.425 | 300.000 | 43% |

2) § 3 verður orðað soleiðis:

"§ 3. Hvør persónur, sum er undir fullari skattskyldu eftir reglunum í § 1 í samtíðarskattalógini og sum er 67 ár ella eldri ella fær avlamis-, einkju- ella fólkapensjón ella hjálp eftir § 13 í forsorgarlógini, fær í útroknaða landsskattinum ein landsskattafrádrátt.

**Stk. 2.** Frá og við inntøkuárinum 1993 er frádrátturin fyri giftar persónar, sum eru 67 ár ella eldri, og giftar persónar, sum fáa avlamis- ella fólkapensjón ella fáa hjálp eftir § 13 í forsorgarlógini, 5.500 kr. fyri hvønn.

**Stk. 3.** Frá og við inntøkuárinum 1993 er frádrátturin fyri stakar persónar, sum eru 67 ár ella eldri og stakar persónar, sum fáa avlamis-, einkju- ella fólkapensjón ella fáa hjálp eftir § 13 í forsorgarlógini, 8.300 kr.

**Stk. 4.** Um giftur persónur ikki fær nýtt sín frádrátt til fulnar, verður tann heilt ella partvís ónýtti frádrátturin drigin frá í útroknaða landsskattinum hjá hinum hjúnafelaganum."

2) § 3 affattes således:

"§ 3. For hver person, som er under fuld skattepligt ifølge reglerne i § 1 i kildeskatteloven, og som er 67 år eller mere eller oppebærer invalide-, enke- eller folkepension, eller oppebærer hjælp i henhold til forsorgslovens § 13, indrømmes der i den udregnede landsskat et landsskattefradrag.

**Stk. 2.** Fra og med indtægtsåret 1993 udgør fradraget for gifte personer, som er 67 år eller ældre, og gifte personer, som oppebærer invalide- eller folkepension eller oppebærer hjælp i henhold til forsorgslovens § 13 5.500 kr. pr. person.

**Stk. 3.** Fra og med indtægtsåret 1993 udgør fradraget for enlige personer, som er 67 år eller mere, og enlige personer, som oppebærer invalide-, enke- eller folkepension, eller oppebærer hjælp i henhold til forsorgslovens § 13, 8.300 kr.

**Stk. 4.** Såfremt en gift person ikke fuldt ud kan udnytte sit fradrag, kan det helt eller delvist ubenyttede fradrag fradrages i den anden ægtefælles udregnede landsskat."

3) Í § 4, stk. 1 og 4 og í § 4 a, stk. 1, 2 og 3 verður "28%" broytt til: "27%".

4) Í § 5 verður sum stk. 2 sett:

"**Stk. 2.** Hjá partafeløgum, sum nevnd eru í stk. 1, og lutafeløgum og sum við endan av roknskaparskeiðinum, sum skattur verður álíknaður sambært hesum stk., hava ein partapening ella lutapening, sum er 300.000 kr. ella meira, verður

3) I § 4, stk. 1 og 4 og i § 4 a, stk. 1, 2 og 3 ændres "28%" til: "27%".

4) I § 5 indsættes som stk. 2:

"**Stk. 2.** For aktieselskaber og andelsselskaber, der er nævnt i stk. 1, og som ved slutningen af den regnskabsperiode, som skat skal pålignes i henhold til dette stk., har en aktiekapital eller andelskapitel på 300.000 kr. eller mere, udskri-

skatturin, sum líknaður verður á inntøkur fyri tað roknskaparskeið, sum fellur saman við ella endar í álmanakkaárinum 1992 ella seinni, ásettur til 22%. Skatturin verður býttur sum kommunuskattur og landsskattur, sum ásett í stk. 1."

5) § 8 verður orðað soleiðis:

"§ 8. Vísandi til § 54 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður skattur teirra, ið nevnd eru í § 2, stk. 1, a), b), h), i) og j), sum eru undir avmarkaðari skattskyldu, og sum í inntøkuárinum bert hava A-inntøku, ásettur til 42% av bruttoinntøkuni. Tó verður skattur teirra, ið nevnd eru í § 2, stk. 1, litra j, sum eru undir avmarkaðari skattskyldu viðvíkjandi A-inntøku, sum stavar frá virksemi umborð á skipi, skrásett í FAS, ásettur til 35% av hesi bruttoinntøku."

ves skatten, som pålignes på indtægter for den regnskabsperiode, som falder sammen med eller slutter i kalenderåret 1992 eller senere, til 22%. Skatten fordeles som kommuneskat og landsskat, som fastsat i stk. 1."

5) § 8 affattes således:

"§ 8. Under henvisning til § 54 i lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer, udskrives skatten til dem, der er omhandlede i § 2, stk. 1, a), b), h), i) og j), under begrænset skattepligt, og som i indkomståret kun har haft A-indtægt, med 42% af bruttoindtægten. Dog bliver skatten til dem, der er omhandlede i § 2, stk. 1, litra j, og som er under begrænset skattepligt vedrørende A-indtægt for arbejde, udført ombord på skib, registreret i FAS, udskrevet til 35% af denne bruttoindtægt."

§ 2.

Henda løgtingslóg fær gildi 1. januar 1993.

**Stk. 2.** Broyting nr. 4 fær gildi fyri skattir, sum verða líknaðir á inntøkur frá roknskaparárinum, sum endar í álmanakkaárinum 1992 ella seinni. Tá álíkning verður gjørd fyri tey roknskaparskeið, ið enda í ella fella saman við álmanakkaárinum 1992, verða krøvini til parta- og lutapening sett í mun til støddina av parta- ella lutapeningi pr. 31.12.1992.

§ 2.

Denne lagtingslov træder i kraft 1. januar 1993.

**Stk. 2.** Ændring nr. 4 træder i kraft for skatter, som pålignes indtægter i det regnskabsår, der slutter i kalenderåret 1992 eller senere. Når der foretages påligning for de regnskabsperioder, som ender i eller falder sammen med kalenderåret 1992, bliver kravene til aktie- og andelskapital sat i relation til størrelsen af aktie- eller andelskapitalen pr. 31.12.1992.

**Stk. 3.** Broyting nr. 5 fær gildi fyri skattskylduga inntøku frá og við 1. januar 1993.

**Stk. 3.** Ændring nr. 5 får virkning for skattepligtig indtægt fra og med 1. januar 1993.

**Viðmerkingar:**

Víst verður til felagsviðmerkingarnar í løgtingsmáli nr. 35/1992: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 36/1992: Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 13. november 1992 og eftir 1. viðgerð 25. november 1992 beint í skattanevndina.

Víst verður til viðmerkingarnar í áliti í løgtingsmáli nr. 35/1992: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

Landsstýrið og Toll- og Skattstova Føroya hava á fundi mælt til at broyta § 5 í ásetingarlógini soleiðis, at orðingin í "stk. 2". Hjá partafeløgum, sum nevnd eru í stk. 1, og lutafeløgum og sum við endan ...." til "hjá partafeløgum og lutafeløgum, sum nevnd eru í stk. 1 og sum við endan ....".

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Jørgen Niclasen og Eyðun Viderø) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins saman við uppskotnu broytingini og setir fram soljóðandi:

## broytingaruppskot

## til

## uppskot landsstýrisins

| | |
|---|---|
| Í § 1 pkt. 4 verður byrjanin av stk. 2 orðað: | Dansk tekst uændret. |
| "Hjá partafeløgum og lutafeløgum, sum nevnd eru í stk. 1 og sum við endan". | |

Minnilutin (Finnbogi Arge og Lasse Klein) tekur ikki undir við uppskoti landstýrisins og setir einki uppskot fram.

# 37. Fígging av arbeiði móti rúsdrekkamisnýtslu, fyribyrging og hjálp

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at seta í verk skipan, har ávíst gjald verður lagt á hvørja standard fløsku av øli, víni og brennivíni til fígging - heilt ella partvíst - av arbeiðinum móti rúsdrekkamisnýtslu.

**Viðmerkingar:**

Fyri stuttum fingu vit nýggja rúsdrekkalóg, har skamtanin varð avtikin, aldursmarkið sett niður í 18 ár, hotel- og matstovur fingu skeinkiloyvi og einkarsøla varð sett á stovn í Havn við ætlan um útsølustøð í hvørji sýslu.

Royndir aðrastaðni frá vísa, at slíkar skipanir elva til størri heildarnýtslu og harvið til størri unisnýtslu og fleiri skaðar likamliga, sálarliga og sosialt.

Sostatt økjast krøvini til neyðugt hjálpararbeiði, bæði hvat fyribyrgjandi tiltøkum viðvíkur eins væl og viðgerðarligum tiltøkum.

Tá uppskotið um nýggja rúsdrekkalóg var til viðgerðar í rættarnevndini, vísti undirritaði støðugt á vansarnar av ætlaðu broytingunum og somuleiðis í uppskoti, at tíðin við stórum arbeiðsloysi og sosialum rembingum ikki var tann rætta at seta hesa lóg í verk.

Í rættarnevndini tóktist semja at vera um tað neyðuga og týdningin av, at munagóðar upphæddir vórðu settar av til arbeiðið móti rúsdrekkamisnýtsluni.

Landsstýrið tóktist eisini at skilja týdningin av hesum. Tað, sum tó tíverri er hent, er, at færri krónur eru settar av á løgtingsfíggjarlógini til hetta endamál, og má tað metast bæði hamiligt og ábyrgdarleyst!

Í august mánaði 1992 legði undirritaði uppskot á ting, har "álagt verður landsstýrinum at tryggja neyðugan fíggjarkarm til viðgerðina av rúsdrekkamisnýtarum, og at virksemið hjá verandi viðgerðarstovnum heldur óhindrað fram."

Uppskotið fór eftir 1. viðgerð í fíggjarnevndina, og har hevur tað ligið síðani.

Í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 1993 (2. framløga) er játtanini til Blákrossheimið og Heilbrigdið løgd saman undir konto: "Viðgerð av rúsdrekkamisnýtar-

um", og upphæddin sett til 6,9 mió. kr. Hetta er ein niðurskurður upp á kr. 1,5 mió.

Rætt er, at fíggjarliga merkja vit til trongar tíðir her á landi, men í hesum sambandi eigur tó at havast í huga, at Rúsdrekkasøla Landsins hevur fingið álagt í rakstrinum at hava eitt rakstraravlop upp á 10 mió. kr., sum beinleiðis fer í landskassan.

Umframt hesa upphædd, so kemur landskassin helst at fáa einar 70-90 mió. kr. inn í punktgjøldum v.m., júst orsakað av sølu av rúsdrekka. Sær landsstýrið seg ikki fært fyri at seta neyðuga upphædd av til fyribyrgjandi /viðgerðarlig tiltøk, ja, so er einki annað til at taka - og tá heldur ikki órímligt - at brúkarin sjálvur kemur at bera ein part av kostnaðinum beinleiðis í samband við keyp av rúsdrekka, t.v.s. at eitt ávíst gjald verður lagt á útsøluprísin. Eitt gjald, sum beinleiðis fer í grunn - ætlað til fígging av viðgerðum/fyribyrgjandi tiltøkum.

Her skal nevnast, at í 1981 samtykti Føroya Løgting uppskot frá undirritaða, har álagt varð landsstýrinum at seta líknandi skipan í verk. Tá var tó talan um eykagjald pr. vektprosent alkohol á hvørji standard fløsku og at stovnseta ein "hjálpargrunn móti alkoholmisnýtslu".

Hóast samtyktina, varð uppskotið sum so ikki sett í verk. Orsøkin skuldi verða "fyrisitingarligir trupulleikar". Hjálpargrunnurin varð tó settur í verk við ávísari upphædd á sjálvari fíggjarlógini.

Í staðin fyri at leggja eykagjald eftir vektprosent alkohol verður nú skotið upp, at eykagjald verður sett á hvørja standard fløsku - ljóst øl undantikið.

Hvør upphæddin eigur at verða, kann landsstýrið sjálvt avgera, men metir uppskotsstillarin, at hetta er ein gongd leið at fáa til vega neyðugar játtanir til upplýsandi eins væl og tað viðgerðarliga arbeiðið á hesum øki.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 37/1992: Fígging av arbeiði móti rúsdrekkamisnýtslu, fyribyrging og hjálp.*

Málið er lagt fram av Tordi J. Niclasen tann 18. november 1992 og eftir 1. viðgerð 21. desember 1992 beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og undir viðgerðini havt fund við August G. Wang, formann í Rúsdrekka- og Narkotikaráðnum. Formaðurin greiddi frá arbeiðnum hjá ráðnum, og vísti til ársfrágreiðingina í 1992.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Mikkjal Sørensen, Hergeir Nielsen og Birgir Danielsen) vísir á, at á fíggjarløgtingslógini í 1993 á § 12, rakstrarstað 303243, viðgerð av rúsdrekkamisnýtarum, eru kr. 8.500.000 játtaðar, § 19 rakstrarstað 363598, Blákrossheimið kr. 100.000 og § 19 rakstrarstað 363636 Fráhaldsfeløg kr. 450.000, og § 19, rakstrarstað 363827 Hjálpargrunur móti alkoholmisnýtslu 1 mió. kr.

Sami meirilulutin vísir annars til álitið í løgtingsmáli nr. 84/1991: Løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka, har tað greitt er tilskilað og fortreytað, at upplýsandi virksemi um skaðar við rúsdrekkanýtslu verður framt.

Sami meirilutin tekur ikki undir við fyriliggjandi uppskoti.

Ein minniluti (Helena Dam á Neystabø) tekur støðu í tingsalinum.

Ein annar minniluti (Lisbeth L. Petersen) tekur undir við uppskotinum.

# 38. Eykaskattur til landskassan

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um eykaskatt til landskassan.*

**§ 1.**

Fyri skattaárið 1993 verður útskrivaður eykaskattur til landskassan.

**Stk. 2.** Skyldu at rinda eykaskatt hava persónar, sum eru skattskyldugir í hesum skattaári sambært § 1 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum.

**Stk. 3.** Hesin eykaskattur verður roknaður av skattskyldugu inntøkuni soleiðis, sum henda verður ásett eftir reglunum í galdandi skattalóggávu, samanber stk. 4.

**Stk. 4.** Henda lóg er galdandi fyri inntøkur frá 1. januar 1993 til og við 31. desember 1993.

*lagtingslov om ekstraskat til landskassen.*

**§ 1.**

For skatteåret 1993 udskrives ekstraskat til landskassen.

**Stk. 2.** Pligt til at betale ekstraskat har personer, som er skattepligtige i dette skatteår i medfør af § 1 i lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer.

**Stk. 3.** Denne ekstraskat beregnes af den skattepligtige indkomst således, som denne er fastsat efter regleme i gældende skattelovgivning, jfr. stk. 4.

**Stk. 4.** Denne lov har virkning for indkomster fra 1. januar 1993 til og med 31. december 1993.

§ 2.

Eykaskatturin verður fyri skattskyldugar persónar jbr. § 1 roknaður við 3% av skattskyldugari inntøku upp á 140.000 kr. til 220.000 kr., við 4% av skattskyldugari inntøku upp á 220.000 kr. til 300.000 kr. og við 5,5% av skattskyldugari inntøku upp á 300.000 kr. og hægri. § 54, stk. 2 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum er ikki galdandi fyri eykaskatt eftir hesi lóg.

§ 2.

Ekstraskatten beregnes for personlige skattepligtige jfr. § 1 med 3% af skattepligtig indkomst på 140.000 kr. til 220.000 kr., med 4% af skattepligtig indkomst på 220.000 kr. til 300.000 kr. og med 5,5% af skattepligtig indkomst på 300.000 kr. og højere. § 54, stk. 2 i lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer gælder ikke for ekstraskat efter denne lov.

§ 3.

Eftirhildin fyribilsskattur eftir reglunum í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum saman við eykaskattinum eftir hesi lóg kann ikki vera meira enn 55,5% av tí einstøku útgoldnu A-inntøkuni.

§ 3.

Tilbageholdt foreløbig skat i medfør af lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer sammen med ekstraskat efter denne lov må ikke overstige 55,5% af den enkelte udbetalte A- indkomst.

§ 4.

Landsstýrið fær heimild til at áseta tær reglur, sum eru neyðugar fyri, at henda lóg kann framjast, so sum at áseta reglur, sum skulu tryggja, at persónar ikki kunnu flyta inntøkur frá tíðarskeiðinum, henda lóg er galdandi fyri.

§ 4.

Landsstyret bemyndiges til at fastsætte de for lovens gennemførelse nødvendige regler, som skal sikre, at personer ikke kan overføre indkomst fra det tidsrum, som denne lov er gældende for.

§ 5.

Reglurnar í skattalóggávuni eru annars galdandi fyri eykaskattin eftir hesi lóg, har annað ikki er ásett í hesi lóg.

§ 5.

Reglerne i skattelovgivningen gælder i øvrigt for ekstraskat efter denne lov, hvor ikke andet er foreskrevet i denne lov.

§ 6.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 6.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

**Viðmerkingar:**

Víst verður til felagsviðmerkingarnar í løgtingsmáli nr. 35/1992: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

## Álit

í

*løgtingsmáli nr. 38/1992: Eykaskattur til landskassan.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 13. november 1992 og eftir 1. viðgerð 25. november 1992 beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið og undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Jørgen Niclasen og Eyðun Viderø) tekur undir við málinum og mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Annars vísir meirilutin til viðmerkingar landsstýrisins í løgtingmáli nr. 35/1992: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

Minnilutin (Finnbogi Arge og Lasse Klein) tekur ikki undir við málinum og førir fram:

Hetta er aðru ferð, at sitandi samgonga leggur eykaskatt á føroyingar í hesum valskeiði. Fyrru ferð varð sagt, at eykaskatturin bert skuldi galda fyri 1992. Lítil ivi man vera um, at samgongan komandi ár fer at siga, at eykaskatturin bert skal galda í 1994.

Við hesum støðugt afturvendandi eykaskatti hevur samgongan brotið søguliga 50% skattamarkið. Taka vit onnur gjøld, sum skattaborgarin rindar, við inn í myndina sum t.d. arbeiðsloysistryggingargjaldið, so táttar skattaloftið nú í roynd og veru í tey 60 prosentini.

Við at geva skattahækkingunum nýggj heiti, hevur samgongan megnað at lagt sera tungar byrðar á føroyingar, sum higartil hava funnið seg í hesi hørðu viðferð uttan stórvegis mótmæli.

Hóast landið er í svárari kreppu, so metir minnilutin ikki, at økt skattatrýst er rætta loysnin so leingi, sum onnur tiltøk eru betri. Tað ber á fíggjarlógini væl til at spara hesar 46 mió. kr., sum eykaskatturin skal geva landskassanum. Peningurin kundi t.d. verðið fingin til vega við at strika 46 mió. kr. burtur av íløgunum.

Við hesum viðmerkingum mælir minnilutin (Finnbogi Arge og Lasse Klein) tinginum frá at samtykkja uppskot landsstýrisins og setir í staðin fram soljóðandi:

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at strika íløgur á fíggjarlógini fyri 46 mió. kr. svarandi til ta upphædd, sum eykaskatturin er ætlaður at geva landskassanum.

# 39. Broyting í løgtingslóg um íløgugrunnar

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um íløgugrunnar.*

*lagtingslov om ændring i lagtingslov om investeringsfonde.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 50 frá 23. desembur 1971 um íløgugrunnar við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1, stk. 2 verður sum pkt. 2 sett:
"og síðstu ferð fyri tað inntøkuár, sum er grundarlag fyri skattseting fyri skattaárið 1992, jfr. § 24 í skattalógini."
2) Í § 9 verður sum nýtt stk. 2 sett:
**"Stk. 2.** Gjørd avseting til íløgugrunn, sum ikki verður nýtt, sum nevnt í § 3, stk. 1, kann verða loyst, hóast freistin eftir § 6, stk. 2 ikki er útrunnin. Avsettir íløgugrunnar, sum verða loystir eftir hesum reglum, verða frígivnir á henda hátt:

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 50 af 23. december 1971 om investeringsfonde med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 1, stk. 2 indsættes som pkt. 2:
"og sidste gang for det indkomstår, der danner grundlaget for skatteansættelsen for skatteåret 1992, jfr. § 24 i skatteloven."
2) I § 9 indsættes som nyt stk. 2:
**"Stk. 2.** En foretagen investeringsfondshenlæggelse, der ikke anvendes, som nævnt i § 3, stk. 1, kan hæves, selv om fristen efter § 6, stk. 2, ikke er udløbet. Investeringsfondshenlæggelser, der hæves efter disse regler, frigives således:

1) Íløgugrunnar, sum í roknskapi fyri tey roknskaparskeið, sum enda í ella fella saman við 1992, verða loystir eftir reglunum í hesum stk., verða frígivnir við 1/3 í 1993, 1/3 í 1994 og 1/3 í 1995. Útgjalding fyri hvørt árið verður aftan á 1. september.

2) Íløgugrunnar, sum í roknskapi fyri tey roknskaparskeið, sum enda í ella fella saman við 1993, verða loystir eftir reglunum í hesum stk., verða frígivnir við 1/2 í 1994 og 1/2 í 1995. Útgjalding fyri hvørt árið verður aftan á 1. september.

3) Íløgugrunnar, sum í roknskapi fyri tey roknskaparskeið, sum enda í ella fella saman við 1994, verða loystir eftir reglunum í hesum stk., verða frígivnir í 1995. Útgjalding fyri hvørt árið verður aftan á 1. september 1995.

Tá íløgugrunnur verður loystur eftir hesum stk., verður avsetta upphæddin og 5% afturat fyri hvørt ár frá enda avsetingarársins og til enda av tí inntøkuári, tá upphæddin verður frígivin, løgd afturat skattskyldugu inntøkuni fyri tað inntøkuár, íløgugrunnur verður loystur."

3) Í § 9 verður sum nýtt stk. 3 sett:

"**Stk. 3.** Peningur, sum settur er á konto til íløgugrunn sambært § 5, er trygging av tí skattakravi, sum fylgir av stk. 1 og stk. 2. Peningurin kann ikki verða útgoldin, fyrr enn skattakravið er goldið."

1) Investeringsfondshenlæggelser, der i regnskab for de regnskabsperioder, der ender eller falder sammen med 1992, hæves efter reglerne i dette stk., bliver frigivet med 1/3 i 1993, 1/3 i 1994 og 1/3 i 1995. Udbetalingen foretages efter 1. september for hvert enkelt år.

2) Investeringsfondshenlæggelser, der i regnskab for de regnskabsperioder, der ender eller falder sammen med 1993, hæves efter reglerne i dette stk., bliver frigivet med 1/2 i 1994 og med 1/2 i 1995. Udbetalingen foretages efter 1. september for hvert enkelt år.

3) Investeringsfondshenlæggelser, der i regnskab for de regnskabsperioder, der ender med eller falder sammen med 1994, hæves efter reglerne i dette stk., bliver frigivet i 1995. Udbetalingen foretages efter 1. september 1995. Såfremt investeringsfondshenlæggelse hæves i henhold til reglerne i dette stk., medregnes henlæggelsesbeløbet med tillæg af 5% for hvert år fra henlæggelsesårets udløb og indtil udløbet af det indkomstår, hvori beløbet frigives, i den skattepligtige indkomst for det indkomstår, hvori investeringshenlæggelsen hæves."

3) I § 9 indsættes som nyt stk. 3:

"**Stk. 3.** Det beløb, der er indsat på kontoen for investeringsfond, jfr. § 5, sikrer skattekravet efter stk. 1 og stk. 2 og kan ikke udbetales, før skatten er betalt."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

**Viðmerkingar:**

Víst verður til felagsviðmerkingarnar í løgtingsmáli nr. 35/1992: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 39/1992: Broyting í løgtingslóg um íløgugrunnar.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 13. november 1992 og eftir 1. viðgerð 25. november 1992 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og undir viðgerðini hildið fundir við landsstýrismannin í fíggjarmálum og umboð fyri Toll- og Skattstovu Føroya og er samd um at mæla til at samtykkja uppskot landsstýrisins. Nevndin vísir til viðmerkingar landsstýrisins í løgtingsmáli nr. 35/1992: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt, har víst verður á, at skatturin fyri tey partafeløg og lutafeløg, ið hava 300.000 kr. ella meira í partapeningi ella lutapeningi, verður niðursettur frá 49% til 22%.

Í skrivi frá 17. november 1992 hevur landsstýrið sent løgtinginum fylgjandi áheitan:

"Landsstýrið hevur í sambandi við nærri gjøgnumgongd av uppskotinum til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um íløgugrunnar fylgjandi rætting.

Sambært § 1, nr. 2, 3. punkt). Eftir fyrsta punktum eigur at standa: "....Útgjalding verður aftan á 1. september 1995."

Í danska tekstinum er onki at rættað. Sí annars hjálagda skjal har rættingin er tilskilað."

Líkningarráð Føroya hevur á fundi í skattanevndini skotið upp at seta nýggja reglu í § 1, stk. 2 í løgtingslógini um íløgugrunnar, at fyri feløg, nevnd í § 1 nr. 8-15 í skattalógini, verður avseting síðstu ferð gjørd fyri tað roknskaparskeið, sum fellur saman við ella endar í 1991, og fyri skattskyldugar einstaklingar, sum reka sjálvstøðugt vinnuvirki, verður avseting gjørd síðstu ferð fyri inntøkuárið 1991.

Ein samd skattanevnd setir samsvarandi hesum fram soljóðandi:

**broytingaruppskot**

**til**

**uppskot landsstýrisins**

1) Í § 1, nr. 2, 3. punkt, verður í næsta punktum strikað orðini "fyri hvørt árið".

2) Í løgtingslóg nr. 50 frá 23. desember 1971 um íløgugrunnar við seinri broytingum, verður í § 1, stk. 2 innsett aftan á pkt. 1:

"og fyri feløg, nevnd í § 1 nr. 8-15 í skattalógini, verður avseting síðstu ferð gjørd fyri tað roknskaparskeið, sum fellur saman við ella endar í 1991, og fyri skattskyldugar einstaklingar, sum reka sjálvstøðugt vinnuvirki, verður avseting gjørd síðstu ferð fyri inntøkuárið 1991."

1) Dansk tekst uændret.

2) I lagtingslov nr. 50 fra 23. december 1971 om investeringsfonde med senere ændringer, bliver i § 1, stk. 2 indsat efter pkt. 1:

"og for de selskaber, der er nævnt i § 1, nr. 8-15 i skatteloven, kan henlæggelsen foretages sidste gang for den regnskabsperiode, der falder sammen med eller ender i 1991, og for skattepligtige personer, der driver selvstændig erhvervsvirksomhed, kan henlæggelsen foretages sidste gang for indtægtsåret 1991."

**Álit**

**í**

*løgtingsmáli nr. 39/1992: Broyting í løgtingslóg um íløgugrunnar.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 13. november 1992 og eftir 1. viðgerð 25. november 1992 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og undir viðgerðini hildið fundir við landsstýrismannin í fíggjarmálum og umboð fyriToll- og Skattstovu Føroya og er samd um at mæla til at samtykkja uppskot landsstýrisins. Nevndin vísir til viðmerkingar landsstýrisins í løgtingsmáli nr. 35/1992: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt, har víst verður á, at skatturin fyri tey partafeløg og lutafeløg, ið hava 300.000 kr. ella meira í partapeningi ella lutapeningi, verður niðursettur frá 49% til 22%.

Í skrivi frá 17. november 1992 hevur landsstýrið sent løgtinginum fylgjandi áheitan:

"Landsstýrið hevur í samband við nærri gjøgnumgongd av uppskotinum til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um íløgugrunnar fylgjandi rætting:
Sambært § 1, nr. 2, 3. punkt). Eftir fyrsta punktum eigur at standa:
".....Útgjalding verður aftan á 1. september 1995." etc.
Í danska tekstinum er onki at rætta. Sí annars hjálagda skjal, har rættingin er tilskilað."

Líkningarráð Føroya hevur á fundi í skattanevndini skotið upp at seta nýggja reglu í § 1. stk. 2 í løgtingslógini um íløgugrunnar, at fyri feløg, nevnd í § 1 nr. 8-15 í skattalógini, verður avseting síðstu ferð gjørt fyri tað roknskaparskeið, sum fellur saman við ella endar í 1991, og fyri skattskyldugar einstaklingar, sum reka sjálvstøðugt vinnuvirki, verður avseting gjørd síðstu ferð fyri inntøkuárið 1991.
Ein samd skattanevnd setir samsvarandi hesum fram soljóðandi:

**broytingaruppskot**

**til**

**uppskot landsstýrisins:**

| | |
|---|---|
| 1) Í § 1, nr. 2, 3. punkt verður í næsta punktum strikað orðini "fyri hvørt árið". | 1) Dansk tekst uændret. |
| 2) Í løgtingslóg nr. 50 frá 23. desember 1971 um íløgugrunnar við seinri broytingum verður í § 1, stk. 2 innsett aftan á pkt. 1:<br>"og fyri feløg, nevnd í § 1, nr. 8-15 í skattalógini, verður avseting síðstu ferð gjørd fyri tað roknskaparskeiðið, sum fellur saman við ella endar í 1991, og fyri skattskyldugar einstaklingar, sum reka sjálvstøðugt vinnuvirki, verður avseting gjørd síðstu ferð fyri inntøkuárið 1991." | 2) I lagtingslov nr. 50 fra 23. december 1971 om investeringsfonde med senere ændringer, bliver i § 1, stk. 2 indsat efter pkt. 1:<br>"og for de selskaber, der er nævnt i § 1, nr. 8-15 i skatteloven, kan henlæggelsen foretages sidste gang for den regnskabsperiode, der falder sammen med eller ender i 1991, og for skattepligtige personer, der driver selvstændig erhvervsvirksomhed, kan henlæggelsen foretages sidste gang for indtægtsåret 1991." |

# 40. Avtøka av løgtingslóg um gjaldan úr landskassanum til kommunurnar í mun til talið á pensjónistum v.m.

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg um gjaldan úr landskassanum til kommunurnar í mun til talið á pensjónistum v.m.*

*lagtingslov om ophævelse af lagtingslov om betaling fra landskassen til kommunerne i forhold til antallet af pensionister m.v.*

**§ 1.**

Løgtingslóg nr. 67 frá 12. juni 1990 um gjaldan úr landskassanum til kommunurnar í mun til talið á pensjónistum v.m. verður sett úr gildi.

**§ 1.**

Lagtingslov nr. 67 af 12. juni 1990 om betaling fra landskassen til kommunerne i forhold til antallet af pensionister m.v. ophæves.

**§ 2.**

Henda lóg fær gildi 1. januar 1993.

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft 1. januar 1993.

**Viðmerkingar:**

Víst verður til viðmerkingarnar í løgtingsmáli nr. 35/1992: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

**Álit**

**í**

*løgtingsmáli nr. 40/1992: Avtøka av løgtingslóg um gjaldan úr landskassanum til kommunurnar í mun til talið á pensjónistum v.m.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 13. november 1992 og eftir 1. viðgerð 25. november 1992 beint í skattanevndina.

Soleiðis, sum fíggjarliga støðan er hjá kommununum í løtuni, so heldur minnilutin (Lasse Klein), at tað er rætt at varðveita løgtingslóg nr. 67 frá 12. juni 1990 og mælir tí frá at gera nakrar broytingar.

# 41. Broyting í arvagjaldinum

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í lóg um arvaavgjald.*

§ 1.

Í lóg frá 27. mars 1908 um arvagjald, sum hon er sett í gildi í Føroyum við kgl. fyriskipan nr. 468 frá 8. november 1921 við seinni broytingum, verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 2, A, verður orðað soleiðis:
"Tá ið arvingarnir eru hjúnafelagi, eftirkomarar ella ættleiðingar: 8%".

2) § 2, B, verður orðað soleiðis:
"Tá ið arvingarnir eru foreldur ella eftirkomarar teirra, um so er at tey ikki koma undir litra A: 15%".

3) § 2, C, verður orðað soleiðis:
"Tá ið arvingarnir eru abbar ella ommur arvaleggjarans ella teirra eftirkomarar, um so er, at tey ikki koma undir litra A og litra B: 20%".

4) § 2, D, verður orðað soleiðis:
"Tá ið arvingarnir eru arvingar longur burtur í slektini ella arvurin fer til persónar, ið hann ikki er

*lagtingslov om ændring i lov om arveafgift.*

§ 1.

I lov af 27. marts 1908 om arveafgift, som denne er sat i kraft på Færøerne ved kgl. anordning nr. 468 af 8. november 1921 med senere ændringer, foretages følgende ændringer:

1) § 2, A, affattes således:
"Når arven tilfalder arveladerens ægtefælle, afkom eller adoptivbørn: 8%."

2) § 2, B, affattes således:
"Når arven tilfalder forældre eller personer henhørende til disses afkom, for såvidt de ikke falder ind under litra A: 15%."

3) § 2, C, affattes således:
"Når arven tilfalder arveladerens bedsteforældre eller personer henhørende til disses afkom, for såvidt de ikke falder ind under litra A eller litra B: 20%."

4) § 2, D, affattes således:
"Når arven tilfalder fjernere slægtninge af arveladeren eller personer, der ikke er beslægtet med ham: 30%."

skyldur við: 30%".

5) Í § 2, seinasta stk., verður "Staten" broytt til: "landið" og "10 pct" broytt til: "50%".

6) § 3, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Arvagjald verður bara goldið av arvapørtum upp á 3.000 kr. og hægri."

7) Í § 3, stk. 2 verður "200 kr." broytt til: "5.000 kr."

8) Í § 3, stk. 3 verður "500 kr." broytt til: "10.000 kr."

9) § 43 verður orðað soleiðis:
"Arvagjaldið fer í landskassan."

§ 2.

Henda lóg fær gildi 1. januar 1993 og er galdandi fyri arvagjald, har gjaldsskyldan byrjar aftan á 31. desember

5) I § 2, sidste stk. ændres:
"Staten" til: "landet" og "10%" til: "50%".

6) § 3, stk. 1 affattes således:
"Arveafgift svares kun af arvelodder på 3.000 kr. og højere."

7) I § 3, stk. 2 ændres "200 kr." til: "5.000 kr."

8) I § 3, stk. 3 ændres "500 kr." til: "10.000 kr."

9) § 43 affattes således:
"Arveafgiften tilfalder landskassen."

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1993 og finder anvendelse på afgiftspligt, der indtræder efter 31. december 1992.

**Viðmerkingar:**

Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 1993 (2. framløga) er inntøkan á konto 3202: Arvagjøld, sett til 12,5 mió. kr.

Í fíggjarárinum 1991 var inntøkan 2.762.000 kr. og í hesum fíggjarári verður inntøkan mett til 3,5 mió. kr. Galdandi reglur um arvagjøld eru lóg frá 27. mars 1908, sum hon er sett í gildi í Føroyum við kgl. fyriskipan nr. 468 frá 8. november 1921 við seinni broytingum. Prosentsatsirnir og krónuupphæddirnar, sum arvagjøldini verða roknað eftir, hava verið óbroytt, síðan lógin upprunaliga varð sett í gildi.

Í yvirlitinum niðanfyri verða víst verandi gjald og gjøldini, sum skotin verða upp:

| **Arvaflokkur:** | **Verandi gjald:** | **Uppskot:** |
|---|---|---|
| A: Eftirkomarar | 1 1/4 % - 3 % | 8 % |
| B: Foreldur og teirra eftirkomarar | 4 % - 6 % | 15 % |
| C: Abbar, ommur og teirra eftirkomarar | 7 % - 9 % | 20 % |
| D: Arvingar longur burtur í slekt o.o. | 10 % - 12 % | 30 % |
| C: Stovnar, feløg o.t. | 10 % | 50 % |

Eftir broytingunum 6 - 8 verða minstuupphæddirnar, sum arvagjald verður roknað av, hækkaðar.

Eftir § 43 í lógini fer helvtin av arvagjaldinum í statskassan og hin helvtin í landskassan. Eftir uppskotinum verður hetta broytt soleiðis, at alt arvagjaldið fer í landskassan. Broytingarnar eftir frammanfyri standandi uppskoti verða mettar at geva ta upphædd, ið sett er av á fíggjarlógaruppskotinum.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 41/1992: Broyting í arvagjaldinum.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 14. november 1992 og eftir 1. viðgerð 25. november 1992 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Jørgen Niclasen og Eyðun Viderø) tekur undir við málinum og mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Finnbogi Arge) førir fram:

Sambært fíggjarlógaruppskotinum hjá landsstýrinum fyri komandi ár væntar samgongan, at arvagjøldini fara at geva landskassanum 5 ferðir so nógv sum í verandi ári.

Lógin um arvagjald er smíðað í 1908 og varð sett í gildi í Føroyum í 1921. Hóast mong skattalógin er smíðað hesi árini, so hava føroyskir politikarar altíð latið arvin fingið frið, hann hevur skatthiga sæð havt eina serstøðu eins og rentuskatturin. Men við hesari samgonguni er vent í holuni, fyrst fór samgongan eftir rentuskattinum, og nú stendur so arvagjaldið fyri skotum.

Tað plagdi at liggja djúpt í føroyinginum at spara og leggja til viks til børnini, so tey fingu eina lættari tilveru, men henda skilagóða siðvenja skal eftir øllum at døma revsast. Hóast talan í flestu førum er um skattaðan pening ella skattað virði, sum verða arvað, so megnar landsstýrið, ið dagliga leggur nýggj ok á Føroya fólk, ikki at halda fingrarnar burtur frá arvinum. Í onkrum føri er talan um at hækka gjaldið úr 10% til 50%!

Tann mest vanligi satsurin, tað er arvagjøld til eftirkomarar, verður hækkaður úr 3% til 8%. Hetta tykist kanska ikki so ógvisligt, men fyri tann, sum t.d. arvar eitt hús ella eina trøð, merkir hetta, at viðkomandi skal skaffa sær reiðan kapital fyri at yvirtaka arvin. Um ongin kapitalur frammanundan er til staðar, kann úrslitið lætthiga gerast, at tann, sum arvar, noyðist at selja arvaðu ognina fyri at gjalda skattin.

Minnilutin tekur ikki undir við, at arvagjøldini verða hækkað, men vísir á, at hesar 10 mió., sum talan er um at fáa til vega, heldur eiga at takast burtur av teimum 185 mió. kr., ið fara til óproduktivar íløgur á fíggjarlógini.

Minnilutin (Lasse Klein) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins og førir fram, at verandi gjøld á arvaflokkar hava verið á einum rímuligum støði, og sær onga orsøk til at gera broytingar í arvagjaldinum.

Sambært uppskotinum kunnu fólk, feløg og stovnar lættliga koma í ta støðu, at tey ikki fara at hava ráð ella umstøður at arva, og at vit tá kunnu rokna við, at vit fáa somu umstøður sum í grannalondum okkara, at fólk fara ikki at hava ráð at taka í móti arvi, sjálvt ikki tey nærmastu.

Minnilutin heldur onga orsøk vera at gera broytingar í arvagjaldinum, sum eftir umstøðunum hevur "fungerað" væl.

# 42. Uppskot til løgtingslóg um serligt avgjald á brenniolju

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um serligt avgjald á brenniolju.*

*lagtingslov om særlig afgift på brændselsolie.*

**§ 1.**

Eitt gjald til landskassan uppá 0,95 kr. pr. litur verður lagt á søluna av gassolju (viskositet við 38 stig C undir 200 sec. Redwood I). Vøran er nevnd í Toll- og vøruskránni undir vørukotu nr. 2710.00.61, 2710.00.65, 2710.00.69 og 2710.00.70.

**Stk. 2.** Fyri hvørt oyra, tann av prísráðnum góðkendi lægsti søluprísur á gassolju er oman fyri 2,45 kr./liturin, íroknað oljuavgjaldið, lækkar avgjaldið á gassolju við 0,5 oyrum/liturin. Gjaldið kann ikki vera negativt.

**§ 1.**

Der pålægges en afgift til landskassen på 0,95 kr. pr. liter på salg af gasolie (viskositet ved 38 grader C under 200 sec. Redwood I).Varen er nævnt i Told- og varefortegnelsen under varekode nr. 2710.00.61, 2710.00.65, 2710.00.69 og 2710.00.70.

**Stk. 2.** For hver øre, den af prisrådet godkendte mindste salgspris på gasolie ligger over 2,45 kr./liter, inkl. olieafgiften, nedsættes afgiften med 0,5 øre/liter. Afgiften kan ikke være negativ.

**Stk. 3.** Fyri hvørt oyra, tann av prísráðnum góðkendi lægsti søluprísur á gassolju er niðan fyri 2,45 kr./liturin, íroknað oljuavgjaldið, hækkar avgjaldið á gassolju við 0,5 oyrum/ liturin.

**Stk. 4.** Gjaldið fyri olju, seld í einum mánaði, skal verða goldið Toll- og Skattstovu Føroya í seinasta lagi 22. í øðrum mánaðinum eftir.

**Stk. 5.** Straffrentan er 1,5% fyri hvønn byrjaðan mánað frá tí degi, ov seint er goldið.

**Stk. 6.** Gjøld og rentur, ið fallin eru til gjaldingar, kunnu verða heintað við panting.

§ 2.

Fyri gassolju, latin til skip yvir 20 GT, skal einki avgjald rindast.

**Stk. 2.** Skip og bátar undir 20 GT, sum Toll- og Skattstova Føroya metir vera í vinnu og eru mvg-skrásett, hava rætt til at fáa endurrindað tað gjald, sum tey hava goldið sambært § 1.

**Stk. 3.** Landsstýrið ásetir í kunngerð nærri reglur um endurrindan av gjaldinum sambært hesi lóg.

§ 3.

Brot móti hesi lóg verða sektað, heraftrat kann vøran, sum roynt hevur verið at selja í stríð við givnar reglur, inndragast. Annars verða reglurnar í 10. kap. í løgtingslóg nr. 121 frá 23. desember 1991 um toll at nýta.

§ 4.

Henda lóg fær gildi 1. januar 1993. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr.

**Stk. 3.** For hver øre, den af prisrådet godkendte mindste salgspris på gasolie ligger over 2,45 kr./liter, inkl. olieafgiften, forhøjes afgiften med 0,5 øre/ liter.

**Stk. 4.** Afgiften for den i en måned afsatte olie skal være indbetalt til Toll- og Skattstova Føroya senest den 22. i den anden efterfølgende måned.

**Stk. 5.** Strafrenten er 1,5% for hver påbegyndt måned fra det tidspunkt, der betales for sent.

**Stk. 6.** Afgifter og renter, der er forfaldet til betaling, kan inddrives ved pantning.

§ 2.

For gassolie, leveret til skibe over 20 GT, skal der ikke betales afgift.

**Stk. 2.** Skibe og både under 20 GT, som af Toll- og Skattstova Føroya anses for at være i erhvervsmæssig drift og er moms-registreret, er berettiget til at få refunderet den afgift, som de har betalt i henhold til § 1.

**Stk. 3.** Landsstyret fastsætter i bekendtgørelse nærmere regler om tilbagebetaling af afgiften i henhold til denne lov.

§ 3.

Overtrædelse af denne lov straffes med bøde, hvortil varer, der søges afsat i strid med de her givne bestemmelser, kan konfiskeres. I øvrigt gælder bestemmelserne i kap. 10 i lagtingslov nr. 121 af 23. december 1991 om told.

§ 4.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1993. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 99 af

99 frá 1. oktober 1986 við seinni broytingum um serligt gjald á brenniolju v.m.

1. oktober 1986 med senere ændringer om særlig afgift på brændselsolie m.m.

**Viðmerkingar:**

Uppskot til løgtingslóg um serligt avgjald á brenniolju, sum her verður lagt fram, kemur í staðin fyri løgtingslóg nr. 99 frá 1. oktober 1986 við seinni broytingum um serligt gjald á brenniolju v.m.

Gjaldið fyri tungolju er tikið av.

Tað er SEV og tær stóru framleiðslufyritøkurnar, ið nýta meginpartin av tungoljuni, ið nýtt verður á landi.

Tað, at avgjaldið á tungolju verður tikið burtur, lættir um hjá SEV soleiðis, at møguleiki verður fyri lætta í el-prisinum.

Tað lættir munandi um kappingarførið hjá okkara framleiðslufyritøkum, sum framleiða til útflutnings, at avgjaldið á tungolju verður avtikið og el-prísirnir lækka.

Gjaldið til landskassan upp á brenniolju er sett til 0,95 kr. pr. litur.

Tó verður tað so, at fyri hvørt oyra, tann av prísráðnum góðkendi lægsti søluprísur (tað er søluprísur uttan meirvirðisgjald) á brenniolju er omanfyri 2,45 kr./liturin, íroknað oljuavgjaldið, lækkar avgjaldið á brenniolju við einum hálvum oyra fyri liturin og fyri hvørt oyra, tann av prísráðnum góðkendi lægsti søluprísur á brenniolju er niðan fyri 2,45 kr./liturin, íroknað oljuavgjaldið, hækkar avgjaldið á brenniolju við einum hálvum oyra liturin.

Nýtslan av brenniolju í Føroyum er umleið 90.000.000 litur, og skuldi oljugjaldið sostatt givið 85.500.000 kr. í landskassan.

Oljuprísurin til brúkaran eftir prisinum í løtuni verður umleið 2,45 kr./liturin + meirvirðisgjald umleið 34 oyru.

Núverandi oljuprísur er umleið 2,35 kr./liturin.

Við tað at gjaldið er eitt innlendskt avgjald, verður meirvirðisgjald ikki roknað av hesum.

## Álit

í

*løgtingsmáli nr. 42/1992: Uppskot til løgtingslóg um serligt avgjald á brenniolju.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 13. november 1992 og eftir 1. viðgerð 25. november 1992 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og havt fund við umboð fyri oljufeløgini.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Jørgen Niclasen og Eyðun Viderø) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins, men ger vart við, at meirvirðisgjald ikki verður roknað av avgjaldinum.

Minnilutin (Finnbogi Arge) fegnast um, at tungoljugjaldið verður tikið av, men heldur ikki, at tað er rætt at leggja 10 oyru oman á brennuoljuavgjaldið til húsarhald, samstundis sum MVG-gjald eisini verður lagt oman á verandi prís við tí úrslit, at brennioljan hækkar við umleið 47 oyrum.

Minnilutin (Lasse Klein) førir fram, at hann tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins, og mælir til at avtaka løgtingslógina um serligt avgjald á brennioliu frá 1. oktober 1986 uttan at seta nakra aðra lóg í staðin fyri.

# 43. Løgtingslóg um skrásetingargjald á motorakførum v.m.

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um skrásetingargjald á motorakførum v.m.*

**§ 1.**

Fyri motorakfør v.m., sum eru skrásetingarskyldug eftir ferðslulógini, verður ásett skrásetingargjald, sum byggir á eitt virðisgjald og eitt vektgjald.

**Stk. 2.** Gjaldið verður at rinda í landskassan samstundis, sum akfarið verður skrásett.

**§ 2.**

Virðisgrundarlagið á motorakførum er søluprísur frá seljara í Føroyum til keypara, fróknað at akfarið er útgjørt við allari vanligari útgerð og eykaútgerð. Í virðisgrundarlagið inngongur fakturaprísur, farmagjald, flutningstrygging, vørugjald, uppskipan og klárgerð, men ikki vinningur, skrásetingargjald sambært § 1, skrásetingarsýn, trygging, tollur, vegskattur o.t. í Føroyum.

**Stk. 2.** Fyri akfør, ið hava verið á goymslu hjá bilasølu í meira enn eitt ár, verður heimilað at lækka virðisgrundarlagið við 10 prosentum fyri hvørt byrjað ár, tó ongantíð við meira enn 30 prosentum.

*lagtingslov om registreringsafgift af motorkøretøjer m.v.*

**§ 1.**

For motorkøretøjer m.v., der er registreringspligtige efter færdselsloven, fastsættes en registreringsafgift, der bygger på en værdi- og en vægtafgift.

**Stk. 2.** Afgiften betales til landskassen samtidig med, at køretøjet indregistreres.

**§ 2.**

Værdigrundlaget for motorkøretøjer er salgsprisen fra sælger på Færøerne til køber, iberegnet at køretøjet er forsynet med standardudstyr og ekstraudstyr. I værdigrundlaget indgår fakturapris, fragtafgift, transportforsikring, vareafgift, losning og klargørelse, men ikke sælgers avance, registreringsafgift jfr. § 1, registreringsgebyr, forsikring, told, vejskat o.l. på Færøerne.

**Stk. 2.** For køretøjer, som har været på lager i over et år, bemyndiges der en nedsættelse af værdigrundlaget med 10 procent for hvert påbegyndt år, dog aldrig med mere end 30 procent.

**Stk. 3.** Vektgjaldsgrundarlagið er typugóðkenda eginvektin á akfarinum.

**Stk. 4.** Í førum, har talan ikki er um vanligar søluumstøður, t.d. tá ið seljarin og keyparin er sami persónur, ella tá ið seljarin hevur fíggjarligan áhuga í virksemi ella ogn keyparans, kann tollvaldið áseta virðisgrundarlagið soleiðis, at hetta kemur at fevna tey gjøld og útreiðslur, ið skulu innganga í virðisgrundarlagið sambært stk. 1.

**Stk. 5.** Í førum, har motorakfør verða innflutt av privatum, feløgum, ella stovnum, kann tollvaldið áseta virðisgrundarlagið sambært stk. 1 - 3.

**§ 3.**

**Persónvognar.**
**Virðisgjald:**

| | |
|---|---|
| Undir/under kr. 30.000 | Fast gjald/Fast afgift: 9.900 + 40% |
| kr. 30.000 - kr. 45.000 | kr. 21.900 av/af kr. 30.000 og 68% av restini/af resten |
| kr. 45.000 - kr. 55.000 | kr. 32.100 av/af kr. 45.000 og 138% av restini/af resten |
| kr. 55.000 - kr. 65.000 | kr. 45.900 av/af kr. 55.000 og 163% av restini/af resten |
| kr. 65.000 - kr. 80.000 | kr. 62.200 av/af kr. 65.000 og 178% av restini/af resten |
| 80.000 - | kr. 88.900 av/af kr. 80.000 og 198% av restini/af resten |

*Vektgjald:* 21 kr. pr. kg.

**§ 4.**

**Hýruvognar og skúlavognar.**

*Virðisgjald:* Einki gjald.
*Vektgjald:* Einki gjald.

**Stk. 2.** Skráseting sum hýru- ella skúlavognur er treytað av loyvi frá Føroya Landsstýri ella myndugleika, ið

**Stk. 3.** Vægtgrundlaget er den typegodkendte egenvægt af køretøjet.

**Stk. 4.** I tilfælde, hvor salgsomstændighederne ikke er som sædvanlig, f.eks. når sælger og køber er samme person, eller når sælger har økonomisk interesse i købers virksomhed eller ejendom, kan toldmyndighederne fastsætte værdigrundlaget således, at dette omfatter de afgifter og udgifter, der i henhold til stk. 1 indgår i værdigrundlaget.

**Stk. 5.** I tilfælde, hvor motorkøretøjer importeres af private, foreninger, eller institutioner, kan toldmyndighederne fastsætte værdigrundlaget i henhold til stk. 1 - 3.

**§ 3.**

**Personmotorkøretøjer.**
**Værdiafgift:**

| | |
|---|---|
| Undir/under kr. 30.000 | Fast gjald/Fast afgift: 9.900 + 40% |
| kr. 30.000 - kr. 45.000 | kr. 21.900 av/af kr. 30.000 og 68% av restini/af resten |
| kr. 45.000 - kr. 55.000 | kr. 32.100 av/af kr. 45.000 og 138% av restini/af resten |
| kr. 55.000 - kr. 65.000 | kr. 45.900 av/af kr. 55.000 og 163% av restini/af resten |
| kr. 65.000 - kr. 80.000 | kr. 62.200 av/af kr. 65.000 og 178% av restini/af resten |
| 80.000 - | kr. 88.900 av/af kr. 80.000 og 198% av restini/af resten |

*Vægtafgift:* 21 kr. pr. kg.

**§ 4.**

**Hyrevogne og skolevogne.**

*Værdiafgift:* Ingen afgift.
*Vægtafgift:* Ingen afgift.

**Stk. 2.** Registrering som hyrevogn eller skolevogn er betinget af tilladelse fra Færøernes Landsstyre eller myn-

landsstýrið heimilar at fyrisita hesi loyvir.

**Stk. 3.** Verður hýru- ella skúlavognur skrásettur sum persónvognur áðrenn 4 ár (48 mánaðir), verður skrásetingargjald fyri persónvognar goldið eftir hesi lóg lutfalsliga svarandi til tíðina, sum restar í teimum 48 mánaðunum.

**Stk. 4.** Landsstýrinum verður heimilað við kunngerð at seta reglur um koyrdar kilometrar, innkoyring, umskráseting o.a. sum skjalprógv fyri, at akfarið hevur verið nýtt sum hýru- ella skúlavognur.

**Stk. 5.** Verður hýru- ella skúlavognur seldur til sama vinnuliga endamál, skal keyparin hava loyvi sambært stk. 2.

**§ 5.**

Vøruvognar av skapi og merki sum persónvognar.

*Virðisgjald:* Sum persónvognar.

*Vektgjald:* 50% av gjaldinum fyri persónvognar.

**Stk. 2.** Verður vøruvognur umskrásettur til persónvogn, skal munurin á vektgjaldinum rindast landskassanum.

**§ 6.**

Bussar til 10 persónar ella fleiri, førarin froknaður.

*Virðisgjald:*

| | |
|---|---|
| 10-13 persónar | 29% |
| 14-16 persónar | 15% |
| 17-19 persónar | 7% |
| 20 persónar el.fl. | 0% |

*Vektgjald:* Einki gjald.

dighed, som landsstyret bemyndiger til at administrere disse tilladelser.

**Stk. 3.** Såfremt hyre- eller skolevogne registreres som personvogn før 4 år (48 måneder), betales registreringsafgift for personvogne delvis i overensstemmelse med den tid, der mangler af de 48 måneder.

**Stk. 4.** Landsstyret bemyndiges til ved bekendtgørelse at fastsætte regler om kørte kilometre, indkøring, omregistrering o.a. som dokumentation for, at køretøjet har været benyttet som hyre- eller skolevogn.

**Stk. 5.** Såfremt hyre- eller skolevogn sælges til samme erhvervsmæssige formål, skal køber have tilladelse i henhold til stk. 2.

**§ 5.**

Varevogne af type og fabrikat som personvogne.

*Værdiafgift:* Som personvogne.

*Vægtafgift:* 50% af afgiften for personvogne.

**Stk. 2.** Såfremt en varevogn omregistreres til en personvogn, skal forskellen i vægtafgift betales landskassen.

**§ 6.**

Busser til 10 personer og derover, føreren iberegnet.

*Værdiafgift:*

| | |
|---|---|
| 10-13 personer | 29% |
| 14-16 personer | 15% |
| 17-19 personer | 7% |
| 20 personer el.fl. | 0% |

*Vægtafgift:* Ingen afgift.

§ 7.

*Dragivognar (traktorar) til leguvognar.*
*Virðisgjald:* Einki gjald.
*Vektgjald:* Einki gjald.

§ 8.

*Last- og vøruvognar, dumparar og leguvognar, støddd eftir totalvekt.*

*Virðisgjald:*
3.500 kg og undir: 29%
yvir 3.500 kg: Einki gjald.

*Vektgjald:*
3.500 kg og undir: 6 kr./kg
yvir 3.500 kg: Einki gjald.

§ 9.

*Avlamisvognar.*

*Virðisgjald:* Einki gjald.
*Vektgjald:* Einki gjald.

§ 10.

*Neyðsendarakfør og líkvognar.*
*Virðisgjald:* Einki gjald
*Vektgjald:* Einki gjald.

§ 11.

*Motorsúkklur.*
*Virðisgjald:* 161%
*Vektgjald:* Einki gjald.

§ 12.

*Campingvognar.*
Virðisgjald: 46%.
Vektgjald: 10 kr./kg.

§ 13.

*Viðfestivognar við sløkkiútgerð.*

*Virðisgjald*: Einki gjald.
*Vektgjald:* Einki gjald.

§ 7.

*Slæbevogne (traktorer) til sættevogne.*
*Værdiafgift:* Ingen afgift.
*Vægtafgift:* Ingen afgift.

§ 8.

*Last- og varevogne, dumpers og sættevogne, størrelse efter totalvægt.*

*Værdiafgift:*
3.500 kg og derunder: 29%
over 3.500 kg: Ingen afgift.

*Vægtafgift:*
3.500 kg og derunder: 6 kr./kg
over 3.500 kg: Ingen afgift.

§ 9.

*Invalidevogne.*

*Værdiafgift:* Ingen afgift.
*Vægtafgift:* Ingen afgift.

§ 10.

*Udrykningskøretøjer og rustvogne.*
*Værdiafgift:* Ingen afgift.
*Vægtafgift:* Ingen afgift.

§ 11.

*Motorcykler.*
*Værdiafgift:* 161%.
*Vægtafgift:* Ingen afgift.

§ 12.

*Campingvogne.*
Værdiafgift: 46%.
Vægtafgift: 10 kr./kg.

§ 13.

*Påhængsvogne med brandslukningsudstyr.*
*Værdiafgift:* Ingen afgift.
*Vægtafgift:* Ingen afgift.

§ 14.

*Aðrir viðfestivognar.*

*Virðisgjald:* Einki gjald.
*Vektgjald:* 4 kr./kg.

§ 15.

*Brúkt motorakfør.*

Fyri motorakfør, ið hava verið endaliga skrásett í útlondum í minni enn 1 ár, er skrásetingargjaldið 90% av skrásetingargjaldinum fyri tilsvarandi nýtt akfar.

**Stk. 2.** Hevur motorakfarið verið endaliga skrásett í útlondum úr 1 upp í 5 ár, er skrásetingargjaldið 70% av skrásetingargjaldinum fyri tilsvarandi nýtt akfar.

**Stk. 3.** Í førum, har motorakfarið hevur verið endaliga skrásett í útlondum í 5 ár ella longri, er skrásetingargjaldið 50% av skrásetingargjaldinum fyri tilsvarandi nýtt akfar.

§ 16.

Landsstýrinum verður heimilað at áseta serligar reglur um skyldu at gjalda skrásetingargjald sambært hesi lóg, tá motorakfør verða uppbygd aftan á ferðsluskaða, slit, tering v.m.

**Stk. 2.** Skrokknummar má bert verða flutt, broytt, burturbeint ella ísett við tollvaldsins loyvi.

§ 17.

Fyri ellisakfør, ið verða skrásett, skal einki skrásetingargjald rindast.

**Stk. 2.** Við ellisakfør sambært 1. stk. er at skilja motorakfør, ið eru eldri enn

§ 14.

*Andre påhængsvogne.*

*Værdiafgift:* Ingen afgift.
*Vægtafgift:* 4 kr./kg.

§ 15.

*Brugte motorkøretøjer.*

For motorkøretøjer, der har været registreret i udlandet i mindre end 1 år, er registreringsafgiften 90% af registreringsafgiften for tilsvarende nyt køretøj.

**Stk. 2.** Såfremt motorkøretøjet har været registreret i udlandet fra 1 til 5 år, er registreringsafgiften 70% af registreringsafgiften for tilsvarende nyt køretøj.

**Stk. 3.** I tilfælde, hvor motorkøretøjet har været registreret i udlandet i 5 år eller længere, er registreringsafgiften 50% af registreringsafgiften for tilsvarende nyt køretøj.

§ 16.

Landsstyret bemyndiges til at fastsætte særlige regler om pligt til at erlægge registreringsafgift i henhold til denne lov, når motorkøretøjer repareres efter beskadigelse i færdslen, slid, tæring m.v.

**Stk. 2.** Stelnummer må kun flyttes, ændres, slettes eller isættes med toldvæsenets tilladelse.

§ 17.

For veterankøretøjer, der registreres, skal ikke erlægges registreringsafgift.

**Stk. 2.** Veterankøretøjer ifølge stk. 1 er motorkøretøjer, ældre end 30 år, som

30 ár, og sum framvegis hava sama skap sum upprunaakfarið.

**§ 18.**

Akfør, ið eru skrásett eftir § 10, kunnu ikki skrásetast til aðra nýtslu uttan at greiða skrásetingargjald við umskráseting.

**Stk. 2.** Landsstýrinum verður heimilað við kunngerð at seta nærri reglur fyri, hvussu skrásetingargjaldið skal ásetast við atliti at aldri á akfarinum, meirvirðisgjaldi av søluvirðinum o.ø.

**Stk. 3.** Skrásetingargjaldið kann tó ongantíð vera lægri enn vektgjald sambært § 3 og 30% av virðisgjaldinum fyri sama akfar sum nýtt.

**§ 19.**

Gjald fyri umskráseting við eigaraskifti. Fyri umskráseting av akfari við eigaraskifti skulu kr. 600 verða rindaðar landskassanum.

**§ 20.**

*Gjald fyri burturbeining.*

Til burturbeining av teimum í §§ 3, 4, 5, 6, 7, 8, 10, 15, 17 og 18 nevndu akførum verður landsstýrinum heimilað at áseta eitt gjald, sum verður rindað í landskassan við fyrstu skráseting av akfarinum. Nærri reglur fyri útgjalding fyri burturbeining av akførum verða ásettar av Føroya Landsstýri.

**§ 21.**

Tollvaldið kann krevja alt skjala- og annað tilfar, ið seljarin nýtir sum grund-

fremdeles har samme form som det oprindelige køretøj.

**§ 18.**

Køretøjer, der er registreret i henhold til § 10, kan ikke registreres til anden brug uden at erlægge registreringsafgift ved omregistrering.

**Stk. 2.** Landsstyret bemyndiges til ved bekendtgørelse at fastsætte nærmere bestemmelser om fastsættelse af registreringsafgiften med hensyn til køretøjets alder, moms af salgsværdi m.v.

**Stk. 3.** Registreringsafgiften kan dog aldrig være lavere end vægtafgiften i henhold til § 3 og 30% af værdiafgiften af tilsvarende køretøj som nyt.

**§ 19.**

Afgift for omregistrering ved ejerskifte. For omregistrering af køretøj ved ejerskifte betales kr. 600 til landskassen.

**§ 20.**

*Afgift for skrotning.*

Til skrotning af de i §§ 3, 4, 5, 6, 7, 8, 10, 15, 17 og 18 nævnte køretøjer bemyndiges landsstyret til at fastsætte en afgift, der skal betales til landskassen ved køretøjets første registrering. Nærmere regler for bortskaffelse af motorkøretøjer fastsættes af Færøernes Landsstyre.

**§ 21.**

Toldvæsenet kan forlange alt dokumentations- og andet materiale, der af

arlag fyri virðis- og vektgjaldinum, útflýggjað.

§ 22.

Seljarin hevur skyldu at gera sáttmála fyri hvørt akfar, ið selt verður. Avrit av hesum sáttmála verður at lata tollvaldinum, samstundis sum skrásetingargjaldið verður goldið.

**Stk. 2.** Saman við sølusáttmálanum hevur seljarin skyldu at lata tollvaldinum sundurgreining av samlaða søluvirðinum.

**Stk. 3.** Tollvaldið fær heimild til at fyriskipa, hvussu sundurgreiningin skal gerast.

§ 23.

Landsstýrinum verður heimilað við kunngerð at seta nærri reglur um, úr hvørjum londum og eftir hvørjum treytum motorakfør v.m. kunnu skrásetast, tá tey eru innflutt sum flytigóðs.

**Stk. 2.** Persónur, ið flytur til landið, kann bert hava 1 akfar við sær sum flytigóðs. Skiftir akfarið eigara ella nýtara áðrenn 1 ár eftir skráseting, kemur tað undir skrásetingargjald.

§ 24.

Landsstýrinum verður heimilað við kunngerð at áseta nærri reglur og fyriskipanir hesi lóg viðvíkjandi.

§ 25.

Hann, sum fyri tollvaldinum gevur frásøgn, sum ikki samsvarar viðkomandi farmi ella viðkomandi vøru, slag,

sælgeren anvendes som grundlag for værdi- og vægtafgiften, udleveret.

§ 22.

Sælgeren er forpligtet til at udfærdige kontrakt for hvert køretøj, der handles. Genpart af kontrakten skal overlades til toldvæsenet samtidig med betaling af indregistreringsafgiften.

**Stk. 2.** Sammen med salgskontrakten har sælger pligt til at fremsende en specifikation af den samlede salgsværdi til toldvæsenet.

**Stk. 3.** Toldvæsenet har hjemmel til at foreskrive specifikationsgraden.

§ 23.

Landsstyret hemyndiges til med bekendtgørelse at fastsætte nærmere regler om, fra hvilke lande og efter hvilke betingelser motorkøretøjer m.v. kan registreres, når de er importeret som rejsegods.

**Stk. 2.** En person, der indrejser til landet, kan højst medtage 1 køretøj som rejsegods. Såfremt køretøjet skifter ejer eller bruger inden 1 år efter indregistrering, kommer det under indregistreringsafgift.

§ 24.

Landsstyret bemyndiges til med bekendtgørelse at fastsætte nærmere regler og bestemmelser i forbindelse med denne lov.

§ 25.

Den, som over for toldvæsenet afgiver en angivelse, der ikke svarer til den pågældende ladnings eller de pågældende

mongd ella virði, kemur undir bót, uttan so at hann eftirfarandi prógvførir, at skeivleikin stendst av viðurskiftum, sum hvørki hann sjálvur ella hann, sum var hansara vegna, hevur havt nakað við at gera. Hann, sum hevur givið skeiva frásøgn við tilætlan til at sleppa undan tolli ella avgjaldi ella av órøttum at fáa undantaksloyvi ella endurgjald fyri avgjald ella av órøttum fáa fráskriving í upplag, ella sum átti at havt sæð, at frásøgnin var egnað at havt við sær tílíkar fylgjur, kemur undir bót, hefti ella fongsul upp í 6 mánaðir. Undir somu sektina kemur hann, sum aftrat frásøgn leggur fram skjøl, sum eftir sínum innihaldi eru egnað at hava við sær fylgjur, sum frammanfyri tilskilað, tá hann sá ella átti at havt sæð, at viðkomandi skjøl vóru skeiv ella høvdu brek.

varers art, mængde eller værdi, straffes med bøde, medmindre han med sikkerhed godtgør, at urigtigheden skyldes omstændigheder, hvorpå såvel han selv som den, der handler på hans vegne har været uden indflydelse. Den, der har afgivet den urigtige angivelse med forsæt til at unddrage sig told eller afgift, eller opnå uberettiget fritagelse for eller godtgørelse af told eller afgift, eller uberettiget fraskrivning i oplag, eller som burde have indset, at angivelsen var egnet til at medføre følger af denne art, straffes med bøde, hæfte eller med fængsel indtil 6 måneder. Tilsvarende straffebestemmelser finder anvendelse på den, der i forbindelse med angivelse fremlægger dokumenter, hvis indhold er egnet til at medføre følger, som foran nævnt, når han indså eller burde have indset, at de pågældende dokumenter var urigtige eller mangelfulde.

§ 26.

Brot ella brotsroynd á hesa lóg ella á tær eftir lógini givnu reglur, verður revsað við sekt, um so er, at í hesi lóg ella lóggávu annars ikki er fyrisett serstøk sekt viðvíkjandi hesum.

**Stk. 2.** Er brotið framt av partafelagi, lutafelagi ella tílíkum, kann sektarábyrgd verða áløgd felagnum í sjálvum sær.

§ 26.

Overtrædelse eller forsøg på overtrædelse af nærværende lov eller af de i medfør af loven givne forskrifter straffes med bøde, for så vidt der ikke i denne lov eller lovgivning i øvrigt er fastsat særlig straf herom.

**Stk. 2.** Er overtrædelsen begået af et aktieselskab, andelsselskab eller lignende, kan bødeansvar pålægges selskabet som sådant.

§ 27.

Brot á hesa lóg ella á tær eftir hesi lóg givnu forskriftir verður revsað við bót v.m. sambært avgerð frá tollvaldinum, uttan so at hetta ynskir málið avgjørt

§ 27.

Overtrædelse af denne lov eller af de i medfør af denne lov givne forskrifter straffes med bøde m.v. i henhold til toldvæsenets afgørelse, medmindre

við dómstólin. Bøtur, sum tollvaldið áleggur, fara í landskassan.

**Stk. 2.** Tann, sum av tollvaldinum er álagdur sekt, kann áðrenn 14 dagar aftaná, at sektin er áløgd honum, skrivliga krevja málið skotið inn fyri dómstólin.

**Stk. 3.** Tollvaldið stílar fyri, at málið kemur fyri dómstólin. Tá ið mál um brot móti hesi lóg verður skotið inn til dómstólin, fer tað fram sum politimál.

**Stk. 4.** Bøtur eftir hesi lóg kunnu innheintast við panting.

**§ 28.**

Tey í kapitlunum 68, 69, 70 og 72 í rættargangslógini nevndu rættarmiðal koma eisini í nýtslu í málum sum hesum í sama mun, sum í málum, sum eftir vanligum reglum tilkoma statsadvokatinum at røkja. Er spurningurin at døma fongsulsrevsing, skal ákærdi gerast varugur við, at hann hevur rætt at fáa verja tilnevndan. Persónar, sum eru hýraðir við skipi í uttanlandssigling og persónar, sum ikki eru búgvandi í landinum, kunnu ikki við at biðja um at fáa málið inn fyri rættin, sleppa undan skyldu at fylgja avgerðini hjá tollvaldinum, til avgerð er komin frá dómstólinum.

**§ 29.**

Henda lóg fær gildi 1. januar 1993. Samstundis fer løgtingslóg nr. 102 frá 1. oktober 1986 um skrásetingargjald á motorakførum við seinni broytingum úr gildi.

dette måtte ønske sagen afgjort ved domstolene. Bøder, som toldvæsenet ikender, tilfalder landskassen.

**Stk. 2.** Den, hvem toldvæsenet har pålagt bøde, kan inden 14 dage efter bødepålægget skriftligt begære sagen indbragt for retten.

**Stk. 3.** Sagens indbringelse for retten foranlediges af toldmyndighederne. Når sager angående overtrædelse af denne lov indbringes for domstolene, behandles de som politisager.

**Stk. 4.** Bøder i henhold til denne lov kan inddrives ved udpantning.

**§ 28.**

De i lov om rettens pleje kap. 68, 69, 70 og 72 omhandlede retsmidler finder anvendelse på de pågældende sager i samme omfang, som i sager, som det efter almindelige regler tilkommer statsadvokaten at forfølge. Er der spørgsmål om idømmelse af fængselsstraf, skal tiltalte gøres opmærksom på, at han har ret til at få beskikket en forsvarer. Personer, der er forhyret med skibe i udenrigsfart samt personer, der ikke er bosiddende her i landet, kan ikke ved at begære sagen indbragt for domstolene befri sig for forpligtelse til at efterkomme toldvæsenets afgørelse, indtil rettens afgørelse måtte foreligge.

**§ 29.**

Denne lov træder i kraft 1. januar 1993. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 102 af 1. oktober 1986 om registreringsafgift af motorkøretøjer m.v. ved senere ændringer.

**Viðmerkingar:**

Galdandi lóg um skrásetingargjald á motorakførum er lóg nr. 102 frá 1. oktober 1986 við seinni broytingum.

Í sambandi við at lóg um meirvirðisgjald verður sett í gildi, er neyðugt at broyta lógina solciðis, at hon svarar til broyttu umstøðurnar í avgjaldsskipanini.

Høvið verður nýtt at gera onkrar aðrar broytingar, sum hava verið uppá tal fyrr. Her verður fyrst og fremst hugsað um hýru- og skúlavognar, men eisini onkrar aðrar tillagingar.

Landsstýrið hevur valt, at leggja lógina fram í fullum líki og ikki sum broytingaruppskot til galdandi lóg.

Virðisgrundarlagið í § 2, stk. 1 er orðað eins og í galdandi lóg, tó er orðið "innflutningsgjald" strikað, meðan § 2, stk. 2 heimilar at lækka virðisgrundarlagið fyri akfør, ið hava staðið óseld í meira enn 1 ár hjá bilhandlara.

Henda regla er sett inn, tí at tað hevur víst seg at vera torført at selja slík akfør í kapping við nýinnflutt akfør.

Í § 3 er avgjaldstalvan broytt, tí meirvirðisgjald skal roknast av vinninginum hjá seljara, men ikki av sjálvum skrásetingargjaldinum.

Í galdandi lóg hevur vinningurin hjá seljara ikki verið tikin við í avgjaldsgrundarlagnum, men eftir mvg-reglunum ber hetta ikki til longur.

Sum leiðbeining fyri at gera avgjaldstalvuna er roknað við, at landskassin í avgjaldi sum meirvirðisgjald og skrásetingargjald tilsamans fær somu inntøku sum nú. Sum grundarlag er nýtt eitt meirvirðisgjald upp á 20%, og roknað er við bruttovinningi til seljara upp á 50% av keypskostnaðinum.

Í § 4 eru reglurnar um skráseting av hýru- og skúlavognum heilt broyttar, soleiðis at hesi akfør verða endaliga skrásett til nettovirði. Virðisgjaldið er sett til "einki gjald", meðan endaliga virðisgjaldið í løtuni er 20%. Grundgevingin fyri hesum er, at hesi akfør koma at gjalda meirvirðisgjald, ið ikki verður mótroknað í mvg-roknskapi, tí fólkaflutningur og undirvísing ikki koma undir mvg-skyldu. Lagt kann verða aftrat, at innflutningsgjaldið (33%) fyri hesi akfør verð endurgoldið við skráseting.

Eftir galdandi skipan verður skrásetingargjaldið roknað sum fyri persónvognar, men munurin millum skrásetingargjaldið sum persónvognur og endaliga skrásetingargjaldið upp á 20% verður endurgoldin yvir 3 ár. Henda skipan hevur verið sera trupul at fyrisita, t.d. um akfarið skuldi seljast í 3 ára skeiðinum.

Ætlan landsstýrisins er at fáa setta í verk skipan fyri loyvi at hava raksturvinnu við hýru- ella skúlavogni. Reglurnar í § 4, stk. 2, 3 og 5 verða at nýta, til treytirnar fyri hýru-og skúlavognsraksturvinnu eru settar í verk.

Uppskotið í § 18 er um at broyta reglurnar um skráseting av neyðsendarakførum, tá tey verða seld til privata nýtslu, tí galdandi reglur gera, at tað er heilt

ógjørligt at selja hesi akfør. Talan er mest um sjúkrabilar og løgreglubilar. Hetta eru bilar, ið ofta hava koyrt nógvar kilometrar, tá teir verða seldir, og sum tí falla skjótari í virði.

Skotið er upp, at landsstýrið kann áseta nærri reglur í kunngerð, men í lógini er ivaleyst neyðugt at seta eitt minstamark. Hetta er sett í stk. 2.

Kannað verður, hvussu slíkir bilar verða viðgjørdir í t.d. Danmark, tá teir verða seldir til aðra nýtslu. Møguliga kann henda kanning føra til, at § 18 verður broytt undir nevndarviðgerðini.

## Álit

## í

*Løgtingsmáli nr. 43/1992: Løgtingslóg um skrásetingargjald á motorakførum v.m.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 13. november 1992 og eftir 1. viðgerð 25. november 1992 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Jørgen Niclasen og Eyðun Viderø) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Lasse Klein) førir fram, at í samband við at lóg um meirvirðisgjald verður sett í gildi, er neyðugt at broyta lógina soleiðis, at hon svarar til broyttu umstøðurnar í avgjaldsskipanini, og minnilutin er samdur við landsstýrinum í, at neyðugt er at gera broytingar í hesi lóg, um meirvirðisgjaldið kemur í gildi 1. januar 1993, men mælir til hesar broytingar í uppskoti landsstýrisins, og setir minnilutin (Lasse Klein) sostatt fram soljóðandi:

## uppskot

## til

| | |
|---|---|
| *løgtingslóg um skrásetingargjald á motorakførum v.m.* | *lagtingslov om registreringsafgift af motorkøretøjer m.v.* |
| § 15 gongur út, og sum nýggj § 15 verður sett: | § 15 udgår, og som ny § 15 indsættes: |
| "Skrásetingargjaldið verður roknað av cif-virðinum fyri akfarið. Landsstýrinum verður heimilað at gera reglur fyri aldur v.m." | "Registreringsafgiften beregnes af cif-værdi for køretøjet. Landsstyret bemyndiges til at fastsætte regler for alder v.m." |

Minnilutin ger vart við, at í øllum øðrum førum verður fakturavirðið nýtt, bert ikki, tá talan er um bilar, og hetta heldur minnilutin vera sera órímuligt serstakliga í hesum døgum, tá tosað verður um ikki at diskriminera ávísar vørubólkar, og tí er neyðugt at mæla tinginum til at samtykkja omanfyrinevnda broytinganuppskot til uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Finnbogi Arge) tekur støðu í tingsalinum.

# 44. Endurgjald fyri meirvirðisgjald í samband við sethúsabygging v.m.

**Uppskot**

**til**

*Løgtingslóg um endurgjald fyri meirvirðisgjald í samband við sethúsabygging v.m.*

*Lagtingslov om refusion af meromsætningsafgift i forbindelse med boligbyggeri m.m.*

**§ 1.**

Úr landskassanum verður fyri tíðarskeiðið 1. januar 1993 til 31. desember 1995 eftir umsókn veitt endurgjald fyri meirvirðisgjald í samband við nýbygging av sethúsum og íbúðum.

**Stk. 2.** Meirvirðisendurgjaldið kemur ikki undir skattskyldu.

**Stk. 3.** Húsalánsgrunnurin fyrisitur meirvirðisendurgjaldsskipanina.

**Stk. 4.** Landsstýrið ásetir nærri reglur um fyrisitingina av meirvirðisendurgjaldsskipanini.

**§ 1.**

Landskassen yder i perioden 1. januar 1993 til 31. december 1995 efter ansøgning refusion af meromsætningsafgift i forbindelse med nyopførelse af beboelseshuse og boligejendomme.

**Stk. 2.** Refusion af meromsætningsafgift er ikke skattepligtig.

**Stk. 3.** Ordningen vedrørende refusion af meromsætningsafgift bliver forvaltet af boliglånefonden.

**Stk. 4.** Landsstyret fastsætter nærmere regler om forvaltning af ordningen vedrørende refusion af meromsætningsafgift.

**§ 2.**

Fyri nýbygging ella part av nýbygging verða fyri árið 1993 veittar 600 kr. fyri

**§ 2.**

Til hel eller delvis nyopførelse bliver vedrørende året 1993 udbetalt 600 kr.

m² í meirvirðisendurgjaldi, tó í mesta lagi 63.000 kr.

**Stk. 2.** Fyri nýbygging ella part av nýbygging verða fyri árið 1994 veittar 400 kr. fyri m² í meirvirðisendurgjaldi, tó í mesta lagi 42.000 kr.

**Stk. 3.** Fyri nýbygging ella part av nýbygging verða fyri árið 1995 veittar 200 kr. fyri m² í meirvirðisendurgjaldi, tó í mesta lagi 21.000 kr.

§ 3.

Meirvirðisendurgjaldið kann ikki vera hægri enn tað, sum veruliga er goldið, og skal kunna skjalprógvast.

**Stk. 2.** Meirvirðisendurgjaldið verður ásett av Húsalánsgrunninum aftan á meting grunnsins av sethúsunum/ íbúðini, tá hesi eru innilokað ella liðug.

**Stk. 3.** Umsóknir um meirvirðisendurgjald fyri ávíst ár frammanundan skulu vera grunninum í hendi í seinasta lagi 1. aprfl árið eftir.

**Stk. 4.** Umsóknir, sum eru grunninum í hendi aftan á at freistin í frammanfyri nevndu áseting er úti, verða viðgjørdar sambært reglunum fyri tað árið, grunnurin fær hesar í hendi.

**Stk. 5.** Umsóknir um meirvirðisendurgjald, sum eru grunninum í hendi aftan á 1. aprfl 1996, verða avvístar.

§ 4.

Henda lóg fær gildi 1. januar 1993.

pr. m² i refusion af meromsætningsafgift, dog højst 63.000 kr.

**Stk. 2.** Til hel eller delvis nyopførelse bliver vedrørende året 1994 udbetalt 400 kr. pr. m² i refusion af meromsætningsafgift, dog højst 42.000 kr.

**Stk. 3.** Til hel eller delvis nyopførelse bliver vedrørende året 1995 udbetalt 200 kr. pr. m² i refusion af meromsætningsafgift, dog højst 21.000 kr.

§ 3.

Refusion af meromsætningsafgift kan ikke være højere end det beløb, der faktisk er betalt, og skal kunne dokumenteres.

**Stk. 2.** Refusion af meromsætningsafgift fastsættes af boliglånefonden efter fondens vurdering af beboelseshuset/boligejendommen, når denne er lukket inde eller opførelsen er afsluttet.

**Stk. 3.** Ansøgninger om refusion af meromsætningsafgift vedrørende pågældende år skal være modtaget af fonden senest 1. april året efter.

**Stk. 4.** Ansøgninger, som er modtaget af fonden efter, at fristen i foran nævnte bestemmelse er udløbet, vil blive behandlet efter reglerne gældende for det år, fonden har modtaget disse.

**Stk. 5.** Ansøgninger om refusion af meromsætningsafgift, som fonden har modtaget efter 1. april 1996, vil blive afvist.

§ 4.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1993.

**Viðmerkingar:**

Undir viðgerðini av uppskotinum til løgtingslóg um meirvirðisgjald samtykti løgtingið at áleggja landsstýrinum at leggja fram lógaruppskot fyri løgtingið, sum skal hava til endamáls at veita teimum, sum byggja sethús tey næstu 3 árini, partvíst endurgjald av meirvirðisgjaldinum.

Í tráð við hesa løgtingssamtykt loyvir landsstýrið sær at leggja fram uppskot fyri tingið um: Endurgjald fyri meirvirðisgjald í samband við sethúsabygging v.m.

Uppskotið fevnir um bygging av sethúsum og íbúðum í tíðarskeiðinum frá 1. januar 1993 til 31. desember 1995. Skotið verður upp at lækka endurgjaldsupphæddina fyri hvørt árið sum frálíður.

Fyri árið 1993 verða 600 kr. latnar fyri $m^2$, tó í mesta lagi 63.000 kr., fyri árið 1994 verða 400 kr. latnar fyri $m^2$, tó í mesta lagi 42.000 kr. og í 1995 verða 200 kr. latnar fyri $m^2$, tó í mesta lagi 21.000 kr. Skotið verður upp, at meirvirðisendurgjaldið ikki kemur undir skattskyldu.

Til tess at fáa meirvirðisendurgjald skulu útreiðslurnar av byggingini skjalprógvast. Endurgjaldið kann ongantíð fara upp um tað, sum veruliga er goldið í meirvirðisgjaldi. Skotið verður upp, at meirvirðisendurgjaldsskipanin verður fyrisitin av Húsalánsgrunninum og at endurgjaldið verður áskett av Húsalánsgrunninum aftaná, at grunnurin hevur mett sethúsini/íbúðina, tá hesi eru innilokað ella liðug.

Umsóknir um meirvirðisendurgjald fyri árið frammanundan skulu vera grunninum í hendi í seinasta lagi 1. apríl árið eftir. Fær grunnurin umsókn eftir 1. apríl, verður hon viðgjørd sambært reglunum fyri tað árið, grunnurin fær hesa í hendi. Umsóknir um meirvirðisendurgjald, sum eru grunninum í hendi eftir 1. apríl 1996, verða avvístar.

## Álit

### í

*løgtingsmáli nr. 44/1992: Endurgjald fyri meirvirðisgjald í samband við sethúsabygging.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 13. november 1992 og eftir 1. viðgerð 25. november 1992 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og mælir ein samd skattanevnd løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

# 45. Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 10, stk. 1 verður "83,33%" broytt til: "81,30%".
2) Í § 13, stk. 3, stk. 5 og stk. 6 verður "83,33%" broytt til: "81,30%".
3) Í § 14 verður "20%" broytt til: "23%".
4) Í § 17, stk. 1 verður "16,67%" broytt til: "18,70%".
5) Í § 27, stk. 2 og stk. 8 verður "20%" broytt til: "23%".
6) Í § 28 verður "20%" broytt til: "23%".
7) Í § 40 verður "100%" broytt til: "80%".

**§ 2.**

Henda lóg fær gildi 1. januar 1993.

*lagtingslov om ændring i lagtingslov om meromsætningsafgift.*

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 136 af 8. september 1992 om meromsætningsafgift foretages følgende ændringer:

1) I § 10, stk. 1 ændres "83,33%" til: "81,30%".
2) I § 13, stk. 3, stk. 5 og stk. 6 ændres "83,33%" til: "81,30%".
3) I § 14 ændres "20%" til: "23%".
4) I § 17, stk. 1 ændres "16,67%" til: "18,70%".
5) I § 27, stk. 2 og stk. 8 ændres "20%" til: "23%".
6) I § 28 ændres "20%" til: "23%".
7) I § 40 ændres "100%" til: "80%".

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft 1. januar 1993.

**Viðmerkingar:**

Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald er endurgjald fyri innflutningsgjaldið á vørum á goymslu pr. 31. desember 1992, nú farið verður yvir til meirvirðisgjald, sett til 100%.

Landsstýrið skjýtur upp, at endurgjaldið verður sett til 80%, sum upprunaliga uppskot landsstýrisins ljóðaði uppá.

Í løgtingsmáli nr. 29/1992: Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald hevur landsstýrið skotið upp, at helvtin av upphæddini verður endurgoldin í 1993 og hin helvtin í 1994.

Tí eru settar 28 mió. kr. av á fíggjarlógaruppskotinum fyri 1993 og 28 mió. kr. skulu so aftur játtast á fíggjarlógini 1994.

Landsstýrið hevur í arbeiði sínum við fíggjarlógaruppskotinum fyri 1993 mett tað neyðugt at hækka meirvirðisgjaldið frá 20% til 23%.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 45/1992: Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 13. november 1992 og eftir 1. viðgerð 17. november 1992 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og viðvíkjandi pkt. 7 í uppskotinum um § 40 í løgtingslóg nr. 135 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald mælir ein samd nevnd til, at 100% ikki verður broytt til 80%, men at sama prosenttal skal verða galdandi viðvíkjandi endurgjaldinum fyri innflutningsgjaldinum av vørum á goymslu pr. 31. desember 1992.

Landsstýrið hevur skotið upp at fara aftur til upprunaliga uppskot sítt og í løgtingslóg nr. 29/1992: Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald hevur landsstýrið sett fram uppskot um, at helvtin av upphæddini verður endurgoldin í 1993 og hin helvtin í 1994.

Nevndin ásannar, at vinnan hevur disponerað út frá ávísum fortreytum, og ber ikki til, at hesar verða brotnar aftan á við lóggávu. Nevndin tekur tí ikki undir við uppskoti landsstýrisins viðvíkjandi pkt. 7 í fyriliggjandi lógaruppskoti.

Viðvíkjandi uppskotinum um at broyta meirvirðisgjaldið frá 20% til 23% tekur ein meiriluta (Vilhelm Johannesen, Jørgen Niclasen og Hanus undir Leitinum) undir við uppskotinum og mælir løgtinginum til at samtykkja hetta.

Minnilutin (Finnbogi Arge) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins um at broyta meirvirðisgjaldið frá 20 til 23%. Sami minniluti mælir til, at heilivágur og neyðsynjarvørur fáa eitt meirvirðisgjald upp á 15%, og at arbeitt verður við at diffirentiera satsirnar, og setir fram soljóðandi:

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at diffirentiera satsimar í galdandi løgtingslóg um meirvirðisgjald í neyðugt mát, eitt nú tá talan er um heilivág og neyðsynjarvørur, t.d. eitt MVG gjald upp á 15% í slíkum førum.

Minnilutin (Lasse Klein) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins og er av teirri áskoðan, at MVG gjaldið fær so óhepnar fylgir fyri føroyskan ídnað og vinnu yvirhøvur og kemur at kosta føroyska samfelagnum mong hundrað arbeiðspláss, at óráðiligt er at seta eina tílíka skipan í verk, sum vit ikki kenna avleiðingarnar av.

Undir allari viðgerðini av MVG gjaldinum er komið tíðiliga og greitt fram, at kostnaðarstøðið í Føroyum kemur at hækka munandi, um MVG gjaldið kemur í gildi.

Soleiðis, sum umstøðurnar eru hjá fólki og føroyskum ídnaðarfyritøkum, so kemur MVG gjaldið at verða ein so mikið tyngjandi byrða, at óðamannaverk er at seta skipanina í verk.

Sostatt setir minnilutin (Lasse Klein) fram soljóðandi:

**Uppskot**

**til**

| | |
|---|---|
| *løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald.* | *lagtingslov om ændring i lagtingslov om meromsætningsafgift.* |
| **§ 1.** | **§ 1.** |
| Løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald fer úr gildi. | Lagtingslov nr. 136 fra 8. september 1992 om meromsætningsafgift træder ud af kraft. |
| **§ 2.** | **§ 2.** |
| Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. | Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort. |

Verður omanfyristandandi lógaruppskot ikki samtykt, verður sett fram soljóðandi:

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at útseta gildissetanina av MVG gjaldinum og tí samtykkir Føroya løgting, at MVG lógin ikki fær gildið fyrrenn 1. januar 1995.

Verða omanfyrinevndu uppskot ikki samtykt, setir minnilutin (Lasse Klein) fram soljóðandi:

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at leggja fyri løgtingið lógaruppskot um at frítaka allan heilvág fyri MVG gjald.

# 46. Broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutning

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutning.*

*lagtingslov om ændring i lagtingslov om fremstillings- og indførselsafgift.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 120 frá 23. desember 1991 um avgjald á framleiðslu og innflutning verða frumskjølini, ið nevnd eru í §§ 2 og 4 í lógini, orðað sum í viðløgdu frumskjølum 1 og 2.

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 120 af 23. december 1991 om fremstillings- og indførselsafgift affattes bilagene i lovens §§ 2 og 4 som vist i vedlagte bilag 1 og 2.

**§ 2.**

Henda lóg fær gildi 1. januar 1993.

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft den 1. januar 1993.

**Viðmerkingar:**

Sum er, hevur meginparturin av teim innfluttu nýtsluvørunum umframt 33% í innflutningsgjaldi eisini eitt punktgjald, sum er ymist frá vørubólki til vørubólk.

Sum kunnugt fella tey 33% burtur 1. januar 1993, og meirvirðisgjald kemur í staðin.

Umframt tað verður skotið upp í hjálagda uppskoti til broyting í punktgjøldunum, at meginparturin av punktgjøldunum verður tikin av.

Hetta er í høvuðsheitum:

| | |
|---|---|
| Bakaravørur, sum hava eitt punktgjald upp á | 35% |
| Hunda- og kettufóður | 20% |
| Máling og tilfar til máling | 10% |
| Tannpasta | 25% |
| Fotografiskir filmir, pappír o.a. | 10% |

| | |
|---|---|
| Vørur úr plasti, gummi, leðri, skinni, tundri. Hetta eru klæðir, gólvbelegningur, handskar, kuffert o. s.fr. ..... | 15- 22% |
| Alt vovið tilfar úr silki, ull, bummull og øðrum tilfari. Hetta er alt slag av klæði í metumáli, tógv, teppir o.s.fr. ..... | 15-22% |
| Øll seyma klæði ..... | 15% |
| Skógvar ..... | 10% |
| Allar keramikk-, glas- og postalínsvørur. Tað eru vask, baðikør, spegl, borð, tallerkar, gløs, figurar, ymist pynt o.s.fr. ..... | 30% |
| Smábátar og lystbátar ..... | 10-30% |
| Fototól o.a. ..... | 15-32% |
| Møblar, køkar, skáp o.a. ..... | 17-22-30% |
| Leika, ítróttaútgerð o.a. ..... | 20-35% |
| Bustir, kustar o.a. ..... | 10-35% |

Um hetta uppskot til lóg verður samtykt, verða nú bert punktgjøld eftir á bomm-nm og sukurlátu, øli, víni, brennivíni, tubbaki, bensini, parfumu og alt til hár- og kropsrøkt, fýrverkarí, ymiskum elektriskum tólum, hvítvørum o.ø., maskinum, prutlum, súkklum og el- vørum (lampum o.ø.).

Eftir landsstýrisins meting verða landskassans inntøkur í 1993 av teimum punktgjøldunum, sum eftir eru, 150 - 160 mió. kr.

Umframt hesi punktgjøld verður útjavningargjald lagt á ymiskar innfluttar mjólkaúrdráttir og ís. Hetta verður gjørt í kunngerð.

## Álit

í

*løgtingsmáli nr. 46/1992: Broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutning.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 25. november 1992 og eftir 1. viðgerð 27. november 1992 beint í skattanevndina.

Landsstýrið upplýsir í viðmerkingunum, at meginparturin av innfluttu nýtsluvørunum umframt 33% innflutningsgjaldið eisini hevur eitt punktgjald, sum er ymiskt frá vørubólki til vørubólk. Tey 33% falla burtur 1. januar 1993 og meirvirðisgjaldið verður sett í gildi. Sambært hjálagda uppskoti til broyting í punktgjøldunum skjýtur landsstýrið upp, at meginparturin av punktgjøldunum verður tikin av, og útgreinar hetta í høvuðsheitum.

Skattanevndin hevur havt fund við umboð fyri Toll- og Skattstovu Føroya og hevur tvey broytingaruppskot til frumskjal 1 til høvuðsskránna, og er talan um:

1. 8523.11.00 - 8524.90.00 verður broytt til 8524.10.00 - 8524.90.00, ið fáa avgjald, meðan vørumar óinnspæld magnetbond, magnetplátur o.a. einki avgjald fáa, hetta av teirri orsøk, at avgjaldið ávirkar beinleiðis kappingina hjá føroyskum virkjum, sum framleiða m.a. ljóðbond og software á disklum. Í hesum førum verður punktgjald álagt tvær ferðir, bæði við keyp og sølu. Hetta er kappingaravlagandi sambært sáttamálanum við EF.

2. 8528.10.00 verður broytt til 8528.10.00: 30% + 300 kr. pr. stk., soleiðis at svart/hvítir sjónvarpsmóttakarar og monitorar eru frítiknir fyri punktgjald, og er grundgevingin, at her er talan um annað endamál enn sjónvarp í vanligum týdningi, men eitt tekniskt hjálpitól t.d. til sjókagar, í rúmum á virkjum ella umborð á skipum.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið og undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Jørgen Niclasen og Eyðun Viderø) mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins við nevndu broytingum í frumskjali nr. 1 og setir fram soljóðandi:

**broytingaruppskot**

**til**

**uppskot landsstýrisins**

| **§ 1.** | **§ 1.** |
|---|---|
| Í § 1 verður sett sum stk. 2: | I § 1 sættes som stk. 2: |
| "Í frumskjali 1 til vøruskránna verður TS-Vøruflokkur 8523.11.00 - 8524.90.00 broytt til 8524.10.00 - 8524.90.00 og TS - Vøruflokkur 8528.10.00 fær avgjald á innflutning og framleiðslu: 30% + 300 kr. pr. stk. og TS-Vøruflokkur 8528.20.00 verður strikað." | "I bilag 1 til varefortegnelse ændres TS-Varegruppe 8523.11.00 - 8524.90.00 til 8524.10.00 - 8524.90.00 og TS-Varegruppe 8528.10.00 pålægges indførsels- og fremstillingsafgift på 30% + kr. 300 pr. stk. og TS-Varegruppe 8528.20.00 udgår." |

Minnilutin (Lasse Klein og Finnbogi Arge) førir fram, at neyðugt er at avtaka meginpartin av punktgjøldunum, nú ætlanin er at innføra MVG-gjald frá 1. januar 1993, men hin vegin fær hetta eisini sera óhepnar fylgjur fyri fleiri føroyskar vinnufyritøkur, sum framleiða til føroyska heimaídnaðin.

Tað tykist tí greitt, at føroyski ídnaðurin er sera illa fyri at taka kappingina upp við EF-londini undir teimum treytum, sum landsstýrið hevur samráðst seg til og sum ein meiriluti av Føroya løgtingi hevur tikið undir við, og lítil ivi tykist vera um, at heimaídnaðurin aftaná, at EF-avtalan endaliga kemur í gildi 1. januar 1993, verður uppaftur verri fyri, og at avtalan í síni heild er ein týðuligur fyrimunur fyri EF-londini.

Vit skulu til at taka kappingina upp við fyritøkur, sum í mong ár hava luttikið á altjóða marknaðinum og sum hava brúkt stórar upphæddir til marknaðarkanningar og marknaðarrøkt, og hesa kapping er nærum eingin fyritøka í Føroyum før fyri at taka upp á seg.

Við hesi broytingini fara hesar fyritøkur at koma illa fyri, uttan at onnur tiltøk eru sett í verk fyri at menna tær stórvegis:

1) Allar bakarafyritøkur, sum framleiða til heimamarknaðin,
2) Framleiðsla av máling og tilfari til máling,
3) Allar vørur úr plasti,
4) Allar vørur úr skinni,
5) Framleiðsla av handskum,
6) Framleiðsla av glastrevjabátum.

Bert fyri at nevna nøkur dømi um framleiðslufyritøkur, sum neyvan fáa fótin fyri seg aftur aftaná, at punktgjøldini eru avtikin.

Miðnilutin (Finnbogi Arge) setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Lasse Klein) setir tí fram soljóðandi:

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Heitt verður á landsstýrið um at seta serligar reglur í verk, sum verja um føroyska framleiðslu til heimaídnaðin soleiðis, at hann er betri førur fyri at taka kappingina upp á seg við EF-innfluttar vørur.

# 47. Broyting í løgtingslóg um útvarp

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtinglóg um útvarp.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 23 frá 28. mars 1956 um útvarp verður gjørd henda broyting: § 10 verður strikað.

**§ 2.**

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

*lagtingslov om ændring i lagtingslov om radiospredning.*

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 23 af 28. marts 1956 om radiospredning foretages følgende ændring: § 10 udgår.

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

**Viðmerkingar:**

§ 10 í løgtingslóg nr. 23 frá 28. mars 1956 um útvarp gevur landsstýrinum heimild at geva undantaksloyvi fyri toll og valutagjald av tólum til útvarpið.

Nú lógin um meirvirðisgjald fær gildi á nýggjárinum, fellur innflutningsgjaldið burtur, og í staðin fyri kemur meirvirðisgjald, sum útvarpið, sum er meirvirðisgjaldsskrásett, fær aftur.

Hvat punktgjøldunum viðvíkur er tað so, at tolllógin, sum fekk gildi 1. februar 1992, miðar í móti út frá umsitingarligum sparingum at gera so fá undantøk sum gjørligt. Eisini var miðað í móti við tí lógini at gera íløguvørur tollfríar.

Av teimum vørum, sum útvarpið annars skuldi brúkt, sum punktgjald skal rindast av, verður útvarpið nú at rinda á sama hátt, sum allir aðrir almennir stovnar.

**Álit**

**í**

*løgtingsmáli nr. 47/1992: Broyting í løgtingslóg um útvarp.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 13. november 1992 og eftir 1. viðgerð 24. november 1992 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Hanus undir Leitinum, Jørgen Niclasen, Finnbogi Arge) tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja málið.

Minnilutin (Lasse Klein) tekur støðu í tinginum.

# 48. Broyting í løgtingslóg um sjónvarp

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjónvarp.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 77 frá 21. mai 1982 um sjónvarp verður gjørd henda broyting: § 12 verður strikað.

**§ 2.**

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

*lagtingslov om ændring i lagtingslov om fjernsyn.*

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 77 af 21. maj 1982 om fjernsyn foretages følgende ændring: § 12 udgår.

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

**Viðmerkingar:**

§ 12 í løgtingslóg nr. 77 frá 21. mai 1982 um sjónvarp gevur landsstýrinum heimild at geva undantaksloyvi fyri innflutningsgjøld og valutagjald av tólum til sjónvarpið.

Nú lógin um meirvirðisgjald fær gildi á nýggjárinum, fellur innflutningsgjaldið burtur, og í staðin fyri kemur meirvirðisgjald, sum sjónvarpið, sum verður meirvirðisgjaldsskrásett, fær aftur.

Hvat punktgjøldunum viðvíkur er tað so, at tolllógin, sum fekk gildi 1. februar 1992, miðar í móti út frá umsitingarligum sparingum at gera so fá undantøk sum gjørligt. Eisini var miðað ímóti við tí lógini at gera íløguvørur tollfríar.

Av teimum vørum, sum sjónvarpið annars skuldi brúkt, sum punktgjald skal rindast av, verður sjónvarpið nú at rinda á sama hátt, sum allir aðrir almennir stovnar.

**Álit**

**í**

*løgtingsmáli nr. 48/1992: Broyting í løgtingslóg um sjónvarp.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 13. november 1992 og eftir 1. viðgerð 24. november 1992 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Hanus undir Leitinum, Jørgen Niclasen og Finnbogi Arge) tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja málið.

Minnilutin (Lasse Klein) tekur støðu í tinginum.

# 49. Regulering av fiskiskapinum á NAFO-økinum í 1993

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið tekur til eftirtektar samtyktina á 14. NAFO-ársfundinum í september 1992 um regulering av fiskiskapinum á sáttmálaøkinum í 1993.

**Viðmerkingar:**

14. ársfundurin í NAFO varð hildin í døgunum 14. - 18. september 1992 í Darthmouth, Kanada, um regulering av fiskiskapinum á konventiónsøkinum í 1993.

Limalondini vóru øll umboðað og møttu samstundis nýggju Baltisku londini, sum nú eisini eru limir í felagsskapinum. Russland umboðar fyrrverandi Sovjetsamveldið. Á fundinum eydnaðist ikki at fáa semju um býtið av kvotu millum Russland og Baltisku londini. Hesin spurningur skal vera loystur innanhýsis innan árslok. Eins og undanfarnu ár vórðu fundir samstundis hildnir í ráðgevandi nevndini og fiskivinnunevndini. Undirnevndirnar høvdu eisini sínar fundir.

Umframt at áseta kvotur á NAFO-økinum samtykti fiskivinnunevndin tiltøk til tess at betra um veiðueftirlitið og møguleikan hjá fiskastovnunum at mennast aftur.

**Kvotan á Flemish Cap í 1993:**

Vísindanevndin hjá NAFO legði fram eina stovnsmeting, sum vísir, at stovnurin er á ógvuliga lágum stigi, men at tekin eru um, at 1990-árgangurin er góður. Um ránsveiða verður forðað, eru møguleikar fyri øktari veiðu í 1994. Vísindanevndin mælti til, at veiðan verður so lítil sum gjørligt og serliga, at smáfiskur (undir 40 cm) verður friðaður.

Føroyar settu fram uppskot um, at kvotan á Flemish Cap var óbroytt 12.925 tons, til stovnurin er komin fyri seg. Hetta varð samtykt, og eiga Føroyar sostatt tey somu 2.900 tonsini í 1993, hóast Kanada hevur ásett veiðibann fyri toskin á norðara parti av Stóra Banka (2J3KL), sum hevur við sær, at EEC-fiskiskapurin á "the Nose of the Bank" uttan fyri 200 fjórðingar steðgar. Toskabannið í 3 L heldur fram í 1993.

**Teknisk tiltøk:**

Tey teknisku tiltøkini eru eitt úrslit av serligum fundi í fiskivinnunevndini hjá NAFO í mai 1992 og STACTIC arbeiðsbólkinum hjá fiskivinnunevndini í februar og juli 1992. Niðanfyri standandi tiltøk vórðu samtykt á fundinum:

1. Ein eygleiðaraskipan varð samtykt sum ein royndarskipan í 18 mánaðir galdandi frá 1. januar 1993. Skipanin skal dekka í minsta lagi 10% av egnu fiskidøgum fyri 1992, 15% í 1993 og, um skipanin verður verandi, 20% í 1994. Hetta merkir, at Føroyar við 4 - 13 skipum partar av árinum skulu hava eina skipan, sum telur 1 - 4 eygleiðarar um borð á føroyskum skipum framyvir, alt eftir fiskidøgum á økinum.

Kostnaðurin og dekningurin fyri hvørt einstakt limaland er gjørdur upp við atliti at verandi aktiviteti hjá hvørjum einstøkum limalandi. Fyri Føroyar verður dekningur/kostnaður soleiðis:

| Skipatal | Fiskidagar | 10%/dekn/kostn | 15%/dekn/kostn | 20%/dekn/kostn |
|---|---|---|---|---|
| 5 | 800 | 80dg/145.000 kr. | 120dg/217.000 kr. | 160dg/290.000 kr. |

2. Øll skip skulu nú nýta framleiðsludagbók ella lastaplan, og skal eftirlitið samanbera tey førdu veiðitølini við tað, sum er í lastini. Tað verða ikki ásettir NAFO-umrokningarfaktorar, men hevur ein skipari skyldu til at uppgeva eftirlitinum teir nýttu faktorarnar.

3. Verða tað staðfest brot á veiðireglurnar, skal avvarðandi limaland beinanvegin seta tiltøk í verk innanfyri galdandi heimildir í tí einstaka limalandinum til tess, at slík brot verða gjølla kannað og fáa neyðugar avleiðingar. Eisini

skulu tiltøk gerast til tess at steðga slíkum brotum í tann mun, hetta er gjørligt innanfyri galdandi lógarheimildir í limalandinum.

4. Meskastøddin eftir øllum botnfiskasløgum varð samtykt at verða 130 mm. fyri alt slag av tilfari. Tað verður tó loyvt at nýta 120 mm fyri tilfar sum hamp, polyamide trevjar ella polyester trevjar fram til 1. juni 1994. Fyri tilfar úr caprolan, dederon og kapron verður meskastøddin 120 mm, men tað er tá treytað av, at skipini hava eitt sertifikat umborð, sum prógvar hetta tilfar. Skip, sum royna eftir øðrum fiskasløgum við minni meskastødd, mugu í mesta lagi hava 10% av vanligum botnfiskasløgum í einum háli og í mesta lagi 2,5 tons tilsamans umborð.

5. Minsta fiskastødd varð samtykt fyri:

| | |
|---|---|
| Tosk | 41 cm (fork length) |
| Hvassasprek | 25 cm (total length) |
| Skrubbu | 25 cm (total length). |

Um tað í einum háli er meira enn 10% undirmátsfiskur, skal skipið beinanvegin flyta til annað øki, sum liggur minst 5 fjórðingar burturfrá. Undirmátsfiskur má ikki vera umborð, men skal beinanvegin blakast út aftur.

6. Fundurin samtykti eina upplæringarskipan fyri eftirlitsfólk, har tað er loyvt einum limalandi at hava næmingar við umborð á skipini. Hesir næmingar hava ikki status sum eftirlitsfólk, men kunnu fylgja við umborð sambært galdandi eftirlitsreglum upp til 2 í tali.

Fundurin tók ikki støðu til veiðifráboðan saman við HAIL-skipanini og uppskot um felags fiskiveiðieftirlit, men frágreiðingin frá STACTIC varð samtykt.

## Álit

### í

*løgtingsmáli nr. 49/1992: Regulering av fiskiskapinum á NAFO-økinum í 1993.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 24. november 1992 og eftir 1. viðgerð 11. desember 1992 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins til samtyktar.

# 50. Viðvíkjandi spurninginum um krígsendurgjald hjá teimum føroyingum, sum sigldu undir krígnum

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Føroya løgting áleggur Føroya landsstýri:

1) at allir sjómenn, sum sigldu við føroyskum skipum - 1940 - 1945 - skulu hava endurgjald.
2) at allar einkjur at sjómonnum, sum sigldu við føroyskum skipum - 1940 - 1945- skulu hava endurgjald.
3) at umsóknirnar skulu avgreiðast beinanvegin.

**Viðmerkingar:**

Í mong ár hava føroyskir sjómenn verið fyri vanbýti, tá talan er um krígsendurgjald - ella pensjón fyri teirra leiklut undir øðrum heimsbardaga - frá 1940 til 1945, meðan sjómenn úr øðrum londum hava fingið heilt aðrar sømdir, hetta hóast vit mistu nógv fleiri fólk í mun til fólkatalið, enn onnur lond gjørdu.

Nógv skip komu ikki aftur í aftur, og fleiri hundrað familjur mistu síni kæru, og líðingarnar hjá teimum, sum vunnu upp land, vóru stórar, og spurningurin, um teir sóðu síni kæru aftur, var altíð stórur.

Á sumri og vetri, í ódn og logn, millum minur og u-bátar, flogfør og krígsskip ofraðu hesir menn seg fyri familju og land sítt, góvu øðrum møguleika fyri at breyðføða seg, bæði í Íslandi, Bretlandi og aðrastaðni í heiminum.

Teir eygleiddu minur, u-bátar og flogfør bæði nátt og dag, spurningur var bara, nær teirra tíð var runnin, og deyðaangistin fylgdi teimum á øllum túrum og setti sítt týðuliga spor í dagligu tilveru teirra seinri í lívinum.

Fyri nøkrum árum síðani kom spurningurin fram um endurgjald til teirra, sum á hendan hátt ofraðu seg í krígsárunum 1940 til 1945.

At byrja við vóru treytirnar tær, at føroyskir sjómenn, sum høvdu siglt undir krígnum í minsta lagi 12 mánaðir, skuldu fáa endurgjald, men seinri varð hetta

broytt til seks mánaðir, umframt at teir skuldu prógva, at teir høvdu fingið likamlig ella sálarlig brek svarandi til 25% av heilsustøðu teirra. Meðan tey, sum kundu ávísa, at tey, sum høvdu fingið endurgjald sambæri "lov om krigsulykkesforsikring", einki endurgjald skuldu fáa.

Heldur ikki skuldu teir fáa endgurgjald, sum royndu undir Føroyum við føroyskum fiskiskipum, tí hetta verður ikki roknað sum vandaleið, hóast fleiri skip komu illa fyri, sum royndu undir Føroyum, orsakað av krígsávum.

Veruleikin í dag er hesin:

– at bert hendinga sjómaður kann fáa endurgjald, tí treytin er tann, at rættin til endurgjald hevur tann, ið av krígsávum er vorðin sjúkur.

Trupult verður hjá teimum sjómonnum, sum eru vorðnir sjúkir seinni, at prógva, at hetta var av krígsávum.

Nakrar einkjur fingu endurgjald sambært "lov om krigsulykkeforsikring", men sambært hesum nýggju treytunum fáa heldur ikki hesar krígsendurgjald, hóast flestar av teimum ongantíð sjálvar sluppu at umsita peningin, men hann skuldi umsitast av "Ulykkesforsikringsrådet". Í flestu førum var treytin tann, at peningurin skuldi brúkast til egnan bústað, men nøkur dømi eru um, at einkjur máttu selja húsini aftur við stórum halli.

Nú í nakrar mánaðir eru vit øll mint á krígsárini. Teir, sum sigldu vandaleið, og familjur teirra vóru biðin um at skriva umsókn, og tey flestu fingu fatan av, at endurgjaldið skuldi galda øll.

Ræðslutíðin - krígsárini 1940 til 1945 - skuldi fram aftur í dagsljósið, menn og einkjur fingu boð um at senda umsóknina til almennar myndugleikar, men stutt eftir komu boðini um, at tað var ivasamt, um øll fóru at fáa.

5-2 ár eru liðin, síðani kríggið byrjaði, og fyri tveimum døgum síðani komu boð um, at viðgerðin av umsóknunum er ætlað at taka umleið 1 ár frá hesum degi, sambært fyriliggjandi upplýsingum.

Eisini verður upplýst, at úthitini fyri at fáa endurgjald eru heldur døpur vegna tess, at lógin krevur, at siglingin undir krígnum skal hava verið atvoldin til ítøkiligan skaða, sum hevur gjørt viðkomandi heilt ella partvíst óarbeiðsføran.

Nú hálvthundrað ár aftan á er tað næstan ógjørligt at føra tílík prógv, og eru vánirnar fyri at fáa endurgjald tískil bart út sagt ringar orsakað av hesum upplýsingum.

Føroya landsstýri hevur bart út sagt gjørt gjøldur burtur úr okkara gomlu sjómonnum og einkjum teirra uttan at geva sær far um hetta frammanundan.

Viðgerðarhátturin av hesum máli hevur verið til stóran ampa fyri øll tey, sum á ein ella annan hátt hava verið í samband við hetta mál, og hevði verið til lítlan sóma fyri føroyskar og danskar myndugleikar, og tí má tað vera eitt minsta krav, at allar umsóknir verða viðgjørdar eins og at allir sjómenn, sum enn eru á lívi og einkjur fáa endurgjald, og tí verður sett fram hetta uppskot til samtyktar:

**Álit**

**í**

*løgtingsmáli nr. 50/1992: Viðvíkjandi spurninginum um krígsendurgjald hjá teimum føroyingum, sum sigldu undir krígnum.*

Málið er lagt fram av Lassa Klein, løgtingsmanni tann 13. november 1992 og eftir 1. viðgerð tann 11. desember 1992 beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og vísir til, at talan er um danska lóggávu um krígsendurgjald.

Tikið verður tí ikki undir við málinum.

# 51. Avtøka av løgtingslóg um barnastyrk

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg um barnastyrk.*

**§ 1.**

Løgtingslóg nr. 9 frá 16. januar 1990 um barnastyrk verður sett úr gildi.

**§ 2.**

Henda lóg fær gildi 1. januar 1993.

**til**

*lagtingslov om ophævelse af lagtingslov om børnetilskud.*

**§ 1.**

Lagtingslov nr. 9 af 16. januar 1993 om børnetilskud ophæves.

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft 1. januar 1993.

**Viðmerkingar:**

Barnastyrkurin hevur eftir hesi løgtingslóg verið veittur fyri børn 0-7 ár, ið ikki verða ansað á dagstovni ella í dagrøkt. Við hesi løgtingslóg verður henda veiting avtikin, men barnafrádrátturin í skattinum verður framhaldandi varðveittur.

Sparingarnar við avtøku av lógini eru mettar til 12 mió. kr. í 1993.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 51/1992: Avtøka av løgtingslóg um barnastyrk.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 24. november 1992 og eftir 1. viðgerð 17. desember 1992 beint í almanna - og heilsunevndina.

Landsstýrið mælir til, at løgtingslóg nr. 9 frá 16. januar 1990 verður sett úr gildi.

Nevnda lóg heimilar barnastyrk til børn, ið eru 6 ár ella yngri. Styrkurin er kr. 1.500,- fyri hálvárið fyri børn, ið ikki verða ansað á dagstovni ella í dagrøkt. Er barnið bert hálvan dag á dagstovni ella í dagrøkt, er barnastyrkurin 750 kr. fyri hálvárið.

Landsstýrið upplýsir, at sparingar við avtøku av lógini eru mettar til kr. 12 mió. í 1993.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jørgen Niclasen, Sommer Winther og Eyðálvur Dimon) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein minniluti (Lisbeth L. Petersen) setir einki uppskot fram.

Ein annar minniluti (Lasse Klein ) setir einki uppskot fram.

## Broytingaruppskot

## í

*løgtingsmáli nr. 51/1992: Avtøka av løgtingslóg um barnastyrk.*

Almanna- og heilsunevndin setir fram soljóðandi broytingaruppskot til uppskot landsstýrisins:

Í donsku orðingini í § 1 verður "1993" broytt til "1990".

# 52. Skipan Føroya og EF millum um sínámillum fiskirættindi í 1993

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Vísandi til § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond góðkennir løgtingið viðløgdu skipan, dagfest 26. oktober 1992, um sínámillum fiskirættindi í 1993 Føroya og EF millum.

**Viðmerkingar:**

1. Tann 26. oktober 1992 vóru samráðingar millum umboð fyri Føroya Landsstýri og EF-nevndina í Brüssel um sínámillum fiskirættindi í 1993 Føroya og EF millum. Úrslitið av samráðingunum er hjálagda skipan, undirritað í Brüssel 26. oktober 1992.
2. Sáttmálin fyri 1993 javnvigar á sama støði í toskavirði, sammett við sáttmálan fyri 1992. Sum avtalað undir samráðingunum millum umboð fyri Føroya Landsstýri og EF-nevndina í Tórshavn um sínámillum fiskirættindi í 1991 Føroya og EF millum er sáttmálin millum ríkisstjórnina í Kongaríkinum Danmark og Føroya Landsstýri øðrumegin og ríkisstjórnina í Týska Demokratiska Tjóðveldinum hinumegin um sínámillum fiskivinnuviðurskifti millum Føroyar og Týska Demokratiska Tjóðveldið, sum EF er bundið av eftir týsku sameiningina, farin úr gildi 31. mars 1992.
3. Loyvdu veiðunøgdirnar í 1993 av ósløgdum fiski eru hesar:

**Hjá EEC-skipum á landleiðini:**

Samlaða nøgdin av botnfiski, svartkjafti og makreli verður í 1993 (1992-nøgdin í klombrum, har broytingar eru):

| | | | |
|---|---|---|---|
| 500 | tons | av | toski og hýsu |
| 2.500 | - | - | upsa |
| 7.000 | - | - | kongafiski |
| 3.600 | - | - | blálongu og longu (íroknað stinglaks og langasporl) |
| 1.000 | - | - | flatfiski (svartkalvi íroknaður) |
| 760 | - | - | ymiskum fiskasløgum |
| 25.000 | - | - | svartkjafti |
| 5.300 | - | - | makreli |

**Hjá føroyskum skipum í EEC-sjógvi:**

(a) 800 tons tilsamans av longu, brosmu og blálongu á Rock All-leiðini. Loyvt er eisini at veiða 400 tons av ymiskum botnfiski sum hjáveiðu í ídnaðarfiskiskapi; í 1992 vóru nøgdirnar tær somu. Eisini er loyvt at veiða 940 tons av blálongu á havleiðunum vestan fyri Skotland.

(b) 6.360 tons av tí vestara makrelstovnimum. Roknað verður við, at Føroyar fáa loyvi at veiða 1.000 tons av kvotuni fyri 1990 eystan fyri 4°V, vísandi til stk. 2 í váttaðu frásøgnini frá samráðingunum í Tórshavn.

(c) 7.000 tons av rossamakreli.

(d) 9.000 tons av hvítingsbróðuri, 9.000 tons av nebbasild og 2.000 tons av brislingi. Fiskast kunnu tó eyka 10.000 tons av hvítingsbróðuri (íroknað hjáveiðu av svartkjafti, sum ikki slepst undan) og nebbasild, treytað av, at øll veiðunøgdin fyri hvítingsbróður (íroknað svartkjaft), nebbasild og brisling ikki fer upp um 20.000 tons.

(e) 660 tons av sild vestan fyri Skotland.

(f) 62.000 tons av svartkjafti. Í veiðuni av svartkjafti er loyvt at hava hjáveiðu av gulllaksi, sum ikki slepst undan.

(g) 500 tons av sild í Skagerak.

(h) 125 tons av hemara í øllum EEC-sjógvi. Tó ikki í NAFO 3 PS (St. Pierre og Miquelon).

Hjá føroyskum skipum í grønlendskum sjógvi (samb. § 1 (3) í fiskisáttmálanum millum EF og Grønland).

Í 1993 eru kvoturnar í grønlendskum sjógvi nakað broyttar sammett við árini undan, av tí at øll rækjukvotan nú er flutt eystur um.

(i) 0 tons av rækjum í Vesturgrønlandi í NAFO-øki 1; (Í 1992 105 tons). 1.150 tons av rækjum í Eysturgrønlandi í ICES-øki XIV (í 1992 1.045 tons).

(j) 150 tons av svartkalva undir Vesturgrønlandi og 150 tons undir Eysturgrønlandi.

(k) Eisini verður loyvt at veiða 500 tons av kongafiski í ICES-øki XIV (Eysturgrønland).

(l) Loyvt er í 1991 at veiða 10.000 tons av lodnu við Eysturgrønland.

Vísandi til stk. 2 í váttaðu frásøgnini er á sama hátt sum í 1990 grundarlagið undir semjuni um makrel, at ein heildarkvota verður avtalað millum Noreg, EF og Føroyar. Fer heildarkvotan upp, so skulu Føroyar eisini fáa størri part.

Reglurnar fyri fiskiskapi eru óbroyttar í 1992 bæði hjá Føroyum og EF.

Váttaða frásøgnin, týdd til føroyskt, og allur sáttmálin fyri 1992 á enskum eru løgd hjá.

Váttað frásøgn um samráðingar um fiskiskapin millum EF og Føroyar í Brüssels 26. oktober 1992.

1. Ein sendinevnd umboðandi felagsskapin við harra Henrik Schmiegelow sum formanni, og ein sendinevnd umboðandi Føroya Landsstýri við harra Kjartan Hoydal sum formanni, hittust í Brüssel 26. oktober 1992 til samráðingar um sínámillum fiskiskap í 1993.

   Í samsvari við avtaluna um fiskirættindi millum EF øðrumegin og ríkisstjórn Danmarkar og Føroya Landsstýri hinumegin, samdust sendinevndirnar um at viðmæla myndugleikum teirra, at tær kvotur fyri 1993, ið eru upproknaðar í hjálagda skjali, skulu galda fyri skip hjá øðrum partinum, sum fiska í sjógvi hjá hinum partinum.

2. Partarnir umrøddu røktina av og veiðu av vestara makrelstovninum og vóru samdir um, at tiltøk áttu at verið gjørd, sum avtalað, fyri at fremja virðveiting og gagnnýtan av hesum stovni.

   Føroyski parturin greiddi frá ætlan síni at avmarka veiðuna í 1993 av vestara makrelstovninum í føroyskum sjógvi og føroyska veiðuna í altjóða sjógvi í norska havinum (ICES øki IIa) til í mesta lagi 23.300 tons, íroknað 5.300 tons til EF í føroyskum sjógvi.

   Hesa nøgd hava føroyingar góðkent útfrá einum EF-TAC fyri ICES økini V b (EF øki) VI, VII, VIII a, b, d, e, XXI, XIV upp á 423.170 tons fyri 1993. Føroyar tilskila sær rætt til broytingar, um TAC víkir frá nevndu upphædd. Í slíkum føri samdust partarnir um at samráðast, so at veiðiavmarkingin, sum Føroyar ganga undir, og kvoturnar, sum verða býttar millum partarnar, kunnu broytast sambært frávikunum í TAC.

   Um EF avger, at teirra fiskimenn kunnu fiska partar av teirra kvotu, sum er ásett til EF makrelveiðu í ICES øki II a (uttan EF øki), V b (EF øki), VI, VII, VIIIa, b, d, e, XII og XIV í EF-økinum hjá ICES IV a norðanfyri 59°N, skulu føroyskir fiskimenn sleppa at taka sama part av føroysku kvotuni upp á 6.360 tons á EF-økinum á ICES IVa, norðanfyri 59°N.

   Partarnir vóru samdir um, at ásettu veiðunøgdirnar fyri 1993 viðvíkjandi vestara makrelinum vóru ein ad-hoc avtala fyri 1993 og ikki prejudiserar framtíðar avtalur.

3. Um kvoturnar hjá føroyskum skipum, sum fiska í grønlendskum sjógvi, sambært § 1 (3) í EF-Grønland protokollini (1990-94) var semja.

4. EF-samráðingarnevndin setti fram eitt ynski frá EF-fiskimonnum um loyvi at reka royndarveiðu eftir langasporli (Roundnose Grenadier) í føroyskum sjóøki.

Føroyska sendinevndin lovaði at viðgera eina umsókn um tílíka royndarveiðu við vælvild eftir treytum, ið føroysku myndugleikarnir seta í samráð við umsøkjaramar.

5. Sendinevndirnar samdust um, at um annar parturin ætlar at seta í gildi ella broyta fiskireglur, ið koma at galda fyri fiskifør hjá hinum partinum, skal hann boða hinum partinum frá slíkum ætlanum við minst 14 daga ávaring. Samráðingar skulu verða, um annar parturin ynskir tað. Serliga varð sipað til bannið fyri allari veiðu á Føroya Banka, sum vantandi gongur út 31. juli 1993.

6. Partarnir samdust um, at loyvisreglurnar, sum skulu galda fyri 1993, skulu verða samsvarandi frásøgn, dagfest 26. oktober 1992, viðvíkjandi loyvum.

7. Samráðingarnevndirnar samdust um, at hvør partur skal senda hinum partinum mánaðarhagtøl, og um annar parturin heldur tað vera neyðugt, vikuhagtøl fyri veiðu hjá skipum hjá hinum partinum á sínum fiskiøki.

III 1. Sum úrslit av týsku sameiningini er EF lógligur arvingi viðvíkjandi "Sáttmálanum millum ríkisstjórnina í Kongaríkinum Danmark og Føroya Landsstýri øðrumegin og ríkisstjórnina í Týska Demokratiska Tjóðveldinum hinumegin um sínámillum fiskivinnuviðurskifti millum Føroyar og Týska Demokratiska Tjóðveldið", undirskrivaður 14. mai 1986, og er galdandi fyri fyrsta fimm ára skeiðið til 31. mars 1992.

2. Samráðingarnevndirnar staðfestu aftur, at sáttmálin verður settur úr gildi skjótast gjørligt.

*Brüssel, 26. oktober 1993.*

| | |
|---|---|
| **EEC-sendinevndin** | **Føroyska sendinevndin** |
| *Henrik Schmiegelow (sign.)* | *Kjartan Hoydal (sign.)* |
| *Samráðingarnevndin* | *Samráðingarnevndin* |
| *fyri Felagsskapin* | *fyri Føroyar* |

Skjal (bls. 1)

**Kvotur í 1992.**

1. Hvør parturin skal lata kvotur, sum nevndar eru niðanfyri, til hin partin á sjóøki sínum.

1.1. Kvotur hjá EEC-skipum á føroyskum sjóøki.

| Fiskasløg | Øki | Nøgd (tons) |
|---|---|---|
| Toskur og hýsa | Vb | 500 |
| Upsi | Vb | 2.500 |
| Kongafiskur | Vb | 7.000 |
| Blálonga og longa | Vb | 3.600 (1) |
| Flatfiskur | Vb | 1.000 (2) |
| Svartkjaftur | Vb | 25.000 |
| Makrelur | Vb | 5.300 |
| Onnur fiskasløg | Vb | 760 |

(1) Íroknað hjáveiðu av langasporli og stinglaksi.

(2) Íroknað svartkalva.

Skjal (bls. 2)

**1.2. Kvotur hjá føroyskum skipum í EEC-sjógvi.**

| **Fiskasløg** | **Fiskiøki ICES-øki clla NAFO-øki** | **Nøgd (tons)** |
|---|---|---|
| Longa, brosma og blálonga | VIa (1) VIb | 800 (2)(3) |
| Blálonga | VIa (1), VIb | 940 (4) |
| Makrelur | VIa (1),VII,e,f,h | 6.360 |
| Sild | VIa (1) | 660 |
| Rossamakrelur | IV,VIa (1),VIIe,f,h | 7.000 |
| Hvítingsbróður | IV,VIa (1) | |
| Brislingur | IV,VIa (1) | 20.000 (5) |
| Nebbasild | IV | |
| Svartkjaftur | VIa (1),VIb,VII (6) | 62.000 (7) |
| Annar botnfiskur (bert hjáveiða) | IV,VIa (1) | 400 |
| Sild | IIIaN (Skagerak) (8) | 500 |
| Hemari | Alt EEC-øki (undan tikið NAFO 3 PS) | 125 (2) |

(1) Norðan fyri 56°N
(2) Veiðast við línu.
(3) Av hesum kunnu sum hjáveiða av øðrum sløgum veiðast upp til 20% í nøgd av hvørjum skipi sær. Hetta er loyvt í ICES øki VIa og b. Hóast hetta kann prosentparturin verða størri í teir fyrstu 24 tímarnar av túrinum á ávísum fiskiøki. Samlaða hjáveiðan av øðrum fiski í VIa og VIb má ikki vera meir enn 75 tons.
(4) Kann bert veiðast við troli. Hjáveiða av langasporli og stinglaksi verður mótroknað í kvotuni.
(5) Í hesi heildarkvotu (sum er hvítingsbróður og nebbasild og hjáveiða av svartkjafti, sum ikki slepst undan) eru í mesta lagi 2.000 tons av brislingi.

Av hesum kunnu í mesta lagi 6.000 tons fiskast í ICES-økinum VIa norðan fyri 56°30'N, treytað av, at EEC eftir áheitan fær gjølligar upplýsingar um veiðunøgd og samanseting av hjáveiðu.

(6) Vestanfyri 12°00'V.
(7) Veiðan av svartkjafti kann hava í sær hjáveiðu av gulllaksi, sum ikki slepst undan.
(8) Avmarkað vestureftir av einari linju frá Hanstholm-vita til Lindenes-vita, suðureftir av einari linju frá Skagen-vita til vita í Tistlarne og haðani til nærmastu strond í Svøriki.

**1.3** P. M. Kvotur hjá føroyskum skipum í grønlendskum sjógvi s.n. § 1, stk. 3 í fiskiveiðisáttmála millum EF og Grønland

| **Fiskasløg** | **Fiskiøki: ICES-øki ella NAFO-øki** | **Nøgd tons** |
|---|---|---|
| Rækjur | NAFO 1 (1) | 0 |
| Rækjur | XIV | 1.150 |
| Svartkalvi | NAFO 1 | 150 |
| | XIV | 150 |
| Kongafiskur | XIV | 500 |
| Lodna | XIV | 10.000 |

**Álit**

**í**

*løgtingsmáli nr. 52/1992: Skipan Føroya og EF millum um sínámillum fiskirættindi 1993.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 25. november 1992 og eftir 1. viðgerð 17. desember 1992 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins til samtyktar.

# 53. Broyting í løgtingslóg um skrásettar grannskoðarar

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skrásettar grannskoðarar.*

*lagtingslov om ændring i lagtingslov om registrerede revisorer.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 65 frá 21. mai 1980 um skrásettar grannskoðarar verður gjørd henda broyting: § 15, stk. 2 verður soljóðandi:

"**Stk. 2.** Grannskoðarar hava til 1. juni 1993 rætt til at verða upptiknir í skrásetingina av grannskoðarum, um teir lúka krøvini í § 1, stk. 2, nr. 1 - 5, samanber stk. 3, og í minsta lagi 10 ár hava havt sjálvstøðugt grannskoðaravirksemi sum høvuðsyrki."

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 65 af 21. maj 1980 om registrerede revisorer foretages følgende ændring: § 15, stk. 2 affattes således:

"**Stk. 2.** Revisorer har indtil 1. juni 1993 ret til at blive registreret, når de opfylder betingelserne i § 1, stk. 2, nr. 1 - 5, jfr. stk. 3, og som i mindst 10 år har udøvet selvstændigt revisorerhverv som hovederhverv."

**§ 2.**

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

**Viðmerkingar:**

Eftir § 1, stk. 2 í galdandi lóg skal persónur fyri at kunna verða skrásettur sum grannskoðari:

1) hava heimarætt í ríkinum,
2) búgva í Føroyum,
3) hava fylt 25 ár,
4) ikki verða gjørdur ómyndigur, vera undir verju ella hava búgv sítt til trotaviðgerð,
5) hava staðið prógtøkur ella royndir, sum landsstýrið hevur góðkent til hetta endamál og
6) í minsta lagi 3 ár aftan á at hava fylt 18 ár hava útint alt vanligt bókhalds-, roknskapar- og grannskoðaraarbeiði hjá einum statsgóðkendum ella skrásettum grannskoðara. Landsstýrið kann víkja frá krøvunum í stk. 2, nr. 1.

Í fleiri útjaðaraøkjum er ongin statsgóðkendur ella skrásettur grannskoðari, soleiðis at møguleiki er ikki hjá persóni, sum annars lýkur treytimar nr. 1) - 5), at verða skrásettur uttan at flyta av staðnum og í 3 ár arbeiða hjá einum statsgóðkendum ella skrásettum grannskoðara, t.d. í høvuðsstaðarøkinum.

Í lóggávu og umsitingarligari praksis verður yvirhøvur í alt størri mun sett krav um, at í minsta lagi skrásettur grannskoðari hevur váttað ymisk viðurskifti. Her kann nevnast kunngerð um uppgerð og endurrindan av innflutningsgjaldi á vørugoymslu, har uppgerðin av vørugoymslum skal váttast av í minsta lagi skrásettum grannskoðara, og praksis hjá landsstýrinum um, at eginpeningur og umsetningur skal váttast av í minsta lagi skrásettum grannskoðara fyri at fáa løggilding sum inn- og útflytari av fiski. Haraftrat kann væntast, at nýggj partafelagslóg fær gildi, har m.a. virðið av lutum, sum verða skotnir inn í felagið sum partapeningur, og ársroknskapur skulu váttast av í minsta lagi skrásettum grannskoðara.

Fyri at loysa trupulleikarnar í útjaðaraøkjunum og fyri at fáa eina hóskandi skiftisskipan fyri verandi grannskoðarar, nú umstøðurnar at virka sum grannskoðari í alt størri mun verða tengdar at kravi um skráseting ella løggilding, verður skotið upp, at kravið um at hava arbeitt í 3 ár hjá statsgóðkendum ella skrásettum grannskoðara verður slept, um persónur í staðin hevur havt grannskoðaravirksemi sum høvuðsyrki í minsta lagi í 10 ár. Hetta minnir um ta skiftisskipan, sum var galdandi, tá lógin um skrásettar grannskoðarar fekk gildi. Einasti munur er, at kravið um tíðarskeiðið, sum persónur eftir tágaldandi skipan skuldi hava havt grannskoðaravirksemi sum høvuðsyrki, bert var sett til 3 ár.

Landsstýrið heldur tað ikki vera ráðiligt at gera eina skipan, har tað framhaldandi verður gjørt undantak til pkt. 6, serliga tá hugsað verður um, at donsku reglurnar fyri skráseting av grannskoðarum ætlandi verða gjørdar nógv strangari. Tað verður tí skotið upp, at skipanin bert skal vera galdandi til 1. juli 1993.

# 54. Broyting í løgtingsvallógini

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um val til Føroya løgting.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 49 frá 20. juli 1978, sum broytt við løgtingslóg nr. 42 frá 5. mai 1987, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Sum nýggj § 1 verður sett:
"Løgtingið hevur 27 limir. Føroyar eru eitt valdømi."
2) Í § 12, 1. punktum verður sett í staðin fyri "Hvørt valdømi": "hvørja sýslu".
3) Í § 17, 6. stk. ganga út orðini:
"samstundis til val í ymsum valdømum ella".
4) §§ 32 og 33 ganga út.

**§ 2.**

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir kunngerð.

*lagtingslov om ændring i lagtingslov om valg til Færøernes lagting.*

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 49 af 20. juli 1978, som ændret ved lagtingslov nr. 42 af 5. maj 1987 foretages følgende ændringer:

1) Som ny § 1 indsættes:
"Lagtinget har 27 medlemmer. Færøerne er en valgkreds."
2) I § 12, 1. punktum indsættes i stedet for "opstillingskreds":
"syssel".
3) I § 17, stk. 6 udgår ordene: "samtidig til valg i forskellige valgkredse eller".
4) §§ 32 og 33 udgår.

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

**Viðmerkingar:**

Fyri tveimum árum síðani varð lagt fyri Føroya Løgting uppskot at broyta løgtingsvallógina soleiðis, at Føroyar gjørdust eitt valdømi. Uppskotið fekk nógva umtalu og drúgva viðgerð innan sum uttan tinggátt. Endaliga úrslitið av hesi viðgerð var tó, at uppskotið vann ikki meiriluta í tinginum og fall sostatt.

Síðan hesa viðgerð eru viðurskiftini í samfelagnum nógv broytt og tíverri ikki til tað betra. Hinvegin eru í hesum tíðarbili enn greiðari komið til sjóndar orsøkirnar til, hví støðan í samfelagnum er vorðin so út av lagi vánalig.

Politiska skipanin í Føroyum hevur valt ein politiskan hugburð, har hin einstaki politikkarin, uttan mun til valdømi, er bundin at lokalum áhugamálum og trýsti. Avgerðir hansara eru tí merktar av hesum veruleika.

Henda skipan kom serliga til sjóndar, tá úrslitini frá samgongusamráðingum gjørdust viðtiknar løgtingssamtyktir, har úrslitið greitt var at fáa eina politiska kabalu at ganga upp heldur enn at tæna eini greiðari landsplanlegging. Samtyktir, har lokalpolitikkur vanliga var orsøkin til, at hugtøk sum skipapakkar, skúlapakkar, sjúkrahúspakkar o.s.fr. gjørdust vanlig politisk hugtøk og sum verri var, endaðu sum løgtingssamtyktir.

Avleiðingarnar av hesum politikki, har javnan allar fakligar tilráðingar vóru, og í ávísum førum framvegis verða skúgvaðar til viks, gingu tær ikki ávísum flokkum ella tingmonnum á møti, er, at samfelagið er vorðið kostnaðarmiklari og órationellari at reka.

At vinnustruktururin yvirhøvur higartil hevur verið stýrdur eftir hesum setningi, er í dag greitt, nú úrslitini av hesum stýrislagi vísa seg í vantandi effektivitet, sum speglast í ov høgum íløgukostnaði, høgum skattatrýsti umframt ov høgum lønarlagi og at enda í hópum av trotabúgvum. Hetta veit hvørt mansbam í dag, nú landið er um at kvalast fíggjarliga.

Nú, tað rekur so hart á samfelagið, er politiski spurningurin ikki, hvat vit hava hug til ella vilja, men hvat vit fíggjarliga yvirhøvur kunnu loyva okkum hesumegin og kanska fitt inn í næstu øld.

Bara at reka tað, sum vit longu hava sett okkum fyri, er ein ovurstór avbjóðing til allar politikkarar.

Hóast hesa sannroynd tykist tað framvegis, at íløguhugurin frá áttatiárunum av og á troðkar á. Tað má tí sigast at vera neyðugt, skulu vit ikki framhaldandi skuldarbinda verandi og komandi ættarlið, at broyta vallógina soleiðis, at vit loysa politikkarar landsins úr teimum lokalpolitisku høftunum, sum mangir munnu føla seg bundnar av.

Á teimum fylgjandi síðunum er yvirlit yvir løgtingsvalini 1988 og 1990. Við hesum tølunum sum støði eru dømi sett upp, sum vísa, hvussu úrslitið hevði verið, vóru Føroyar eitt valdømi við ávikavist 21, 27 og 32 tingmonnum. Sjálvsagt eru hesi dømi ikki heilt eftirfarandi, tá uppstillingin til nevndu val bygdu á verandi valskipan. M.a. fær eitt valdømi einki umoð á ting sambært nevndu uppsetingum, meðan okkurt annað verður ríkiliga umboðað. Hetta hevði verið øðrvísi, var støðið undir uppstilling og vali, at Føroyar vóru eitt valdømi. Hóast hesi lýti vísir uppsetingin greitt, at skipanin við einum valdømi er skilagóð loysn fyri Føroyar.

Hóast tingmannatalið hevði verið nóg stórt, vóru tingmenninir 21 í tali, so verður skotið upp at áseta hetta til 27, tí hetta gevur eina breiðari umboðan á tingi.

Hvør flokkur skal í mesta lagi stilla so nógv valevni upp svarandi til mesta talið av tingmonnum.

Tað verður javnan hildið uppá, at verða Føroyar eitt valdømi, so verður umboðanin hjá útjaðarøkjunum við sviðið soð samanborin við miðøkið.

Hesin vansin er sjálvsagt til staðar, men verður rætt fyriskipað í sambandi við møguliga lógarbroyting og verður stillað upp við atliti at teimum smærru valdømunum, fer alt samfelagið Føroyar sum frálíður at fáa gagn av eini broyttari valskipan.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 54/1992: Broyting í løgtingsvallógini.*

Málið er lagt fram av Bjarna Djurholm, løgtingsmanni tann 27. november 1992 og eftir 1. viðgerð 20. januar 1993 beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og undir viðgerðini havt fund við Ólav Clementsen, ið gav frágreiðing um valskipanina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í fýra minnilutar.

Ein minniluti (Birgir Danielsen og Lisbeth L. Petersen), mælir til at samtykkja fyriliggjandi uppskot.

Í øðrum lagi vísir sami minniluti á, at undir nevndarviðgerðini kom fram, at áðrenn galdandi vallóg varð samtykt, vórðu nakrar broytingar gjørdar í mun til upprunauppskotið um býtið millum umdømis- og eykavaldar tinglimir.

Henda broyting hevði við sær, at talið á eykavaldum tinglimum varð skorið niður, samstundis sum talið á umdømisvaldum varð hækkað í sama mun.

Henda broyting hevur síðani víst seg at vera sera óheppin orsakað av, at tað ferð eftir ferð hevur víst seg, at eykavaldir tinglimir resta í, tá tingmannabýtið skal gerast upp aftan á løgtingsval.

Dømi eru um, at størsti flokkur við nærum túsund atkvøðum meira enn tann næsti ikki fekk ágóða av sínum atkvøðutali, men fekk tillutað sama tingmannatal, sum næststørsti flokkur.

Við seinasta val fekk núverandi størsti flokkur 10 tinglimir valdar og var bert fáar atkvørður frá ellinta manninum, hóast hann lutfalsliga átti færri. Annar flokkur fekk sama val bert fýra tinglimir, hóast hesin lutfalsliga kundi fingið fimm.

Okkara valskipan við nøkrum sera smáum valdømum við lutfalsligari yvirumboðan ger harumframt, at skeiva lutfallið millum umdømis- og eykavaldar tinglimir kann í serligum valúrsliti gera, at flokkur, sum t.d. er næststørstur á tingi, men við breiðari umboðan um alt landið, kann fáa fleiri tinglimir tillutaðar, enn størsti flokkur, sum ikki er so breitt umboðaður. Býtið av eykavaldum skuldi

tryggja móti hesum vanbýti, men áðurnevnda skeiva lutfallið ger, at størsti flokkur í nevnda dømi í atkøvðubýti verður ov stuttur, tá eykavaldir verða tillutaðir.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 54/1992: Broyting í løgtingsvallógini.*

Málið er lagt fram av Bjarna Djurholm, løgtingsmanni, tann 27. november 1992 og eftir 1. viðgerð 20. januar 1993 beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og undir viðgerðini havt fund við Ólav Clementsen, ið gav frágreiðing um valskipanina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í fýra minnilutar.

Ein minniluti (Birgir Danielsen og Lisbeth L. Petersen) mælir til at samtykkja fyriliggjandi uppskot.

Í øðrum lagi vísir sami minniluti á, at undir nevndarviðgerðini er komið fram, at áðrenn galdandi vallóg varð samtykt, vórðu nakrar broytingar gjørdar í mun til upprunauppskotið um býtið millum umdømis- og eykavaldar tinglimir.

Henda broyting hevði við sær, at talið á eykavaldum tinglimum varð skorið niður, samstundis sum talið á umdømisvaldum varð hækkað í sama mun.

Henda broyting hevur síðani víst seg at vera sera óheppin orsakað av, at tað ferð eftir ferð hevur víst seg, at eykavaldir tinglimir resta í, tá tingmannabýtið skal gerast upp aftaná løgtingsval.

Dømi eru um, at størsti flokkur við nærum túsund atkvøðum meira enn tann næsti, ikki fekk ágóða av sínum atkvøðutali, men fekk tillutað sama tingmannatal, sum næststørsti flokkur.

Við seinasta val fekk núverandi størsti flokkur 10 tinglimir valdar og var bert fáar atkvøður frá ellivta manninum, hóast hann lutfallisliga átti færri. Annar flokkur fekk við sama val bert fýra tinglimir, hóast hesin lutfalsliga kundi fingið fimm.

Okkara valskipan við nøkrum sera smáum valdømum við lutfalsligari yvirumboðan ger harumframt, at skeiva lutfallið millum umdømis- og eykavaldar tinglimir kann í serligum valúrsliti gera, at flokkur, sum t.d. er næststørstur á tingi, men við breiðari umboðan um alt landið, kann fáa fleiri tinglimir tillutaðar, enn størsti flokkur, sum ikki er so breitt umboðaður. Býtið av eykavaldum skuldi tryggja móti hesum vanbýti, men áðurnevnda skeiva lutfallið ger, at størsti flokkur í nevnda dømi í atkvøðubýti verður ov stuttur, tá eykavaldir verða tillutaðir.

Tí setir sami minniluti, um fyriliggjandi uppskot ikki verður samtykt, fram fylgjandi.

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum í komandi tingsetu at leggja uppskot fyri løgtingið um lógarbroyting, har lutfallið millum umdømis og eykavaldar tinglimir verður broytt soleiðis, at betri samsvar fæst í býtinum millum umdømis og eykavaldar tinglimir.

Ein annar minniluti (Mikkjal Sørensen) tekur ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

Hin triði minnilutin (Hergeir Nielsen) tekur ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

Hin fjórði minniluti (Helena Dam á Neystabø) tekur støðu í tingsalinum.

# 55. Løgtingslóg um nýteknan av partapeningi í P/F Atlantic Airways

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um nýteknan av partapeningi í P/F Atlantic Airways.*

**§ 1.**

Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at tekna kr. 75.000.000,- í partapeningi í P/F Atlantic Airways treytað av, at veðhald landskassans fyri lán til felagið verður strikað.

**§ 2.**

Landsstýrinum verður heimilað at læna neyðuga peningin til partapening samb. § 1.

*lagtingslov om nytegning af aktiekapital i P/F Atlantic Airways.*

**§ 1.**

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at tegne ny aktiekapital pålydende 75.000.000,00 i P/F Atlantic Airways, på betingelse af, at landskassens garanti for lån til selskabet ophæves.

**§ 2.**

Landsstyret bemyndiges til at låne de nødvendige penge til aktiekapitalen, i henhold til § 1.

§ 3.

Henda løgtingslóg fær gildi dagin eftir, at hon er lýst, og samstundis fara hesar løgtingslógir úr gildi:

1) løgtingslóg nr. 11 frá 25. januar 1988 um tekning av partapeningi í felag, við tí endamáli at taka lut í flogferðslu.
2) løgtingslóg nr. 29 frá 20. apríl 1989 um veðhald fyri láni til P/F Atlantic Airways, Faroe Islands og nýtekning av partapeningi í P/F Flogleiðir.

§ 3.

Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort. Samtidig ophæves følgende love:

1) lagtingslov nr. 11 af 25. januar 1988 om tegning af aktiekapital i selskab, hvis formål er at deltage i luftfart.
2) lagtingslov nr. 29 af 20. april 1989 om garanti for lån til P/F Atlantic Airways, Faroe Islands og nytegning af aktiekapital i P/F Flogleiðir.

**Viðmerkingar:**

Partapeningurin í Atlantic Airways er nominelt kr. 14 mió. Holdingfelagið P/F Flogleiðir eigur allan partapeningin. Partapeningurin í Flogleiðum er nominelt 14,2 mió. Landskassin eigur beinleiðis 75% av hesum partabrøvum og hini 25% eigur P/F Flogsamband.

Landskassin eigur góða helvt av partapeninginum í P/F Flogsamband. Alt í alt eigur landskassin tí uml. 87,5 % av partabrøvunum í Atlantic Airways. Í landskassaroknskapinum eru hesi partabrøv bókað við nominella virðinum, sum er kr. 12,2 mió.

Hangarurin, sum Atlantic Airways húsast í, kostaði uml. kr. 54 mió. og er hann goldin beinleiðis yvir fíggjarlógina. Atlantsflog og Strandferðslan leiga hann hinvegin frá landsstýrinum fyri kr. 200,000,- árliga, umframt at hesi bæði skulu gjalda alt viðlíkahald bæði innan og uttan. Hetta er tó ein leiguupphædd, sum í mun til byggikostnað er sera lág.

Tað er eingin loyna, at felagið gevur hall. Sambært roknskapinum var hallið í 1989 kr. 16.980.000,00 og í 1990 kr. 12.389.734,00.

Roknskapurin fyri 1991 vísir eitt hall upp á kr. 487.333,04 uttan avskrivingar. Flogfarið er bókført til 100,5 mió kr., men síðani roknskapurin í 1991 varð gjørdur, hevur óheft konsulentfyritøka virðismett tað til kr. 91 mió.

Vanliga varðveita flogfør virði sítt í minsta lagi í 15 ár; men kreppan í alheims flogferðslu hevur borið í sær, at mong túsund flogfør í løtuni eru bundin á jørðini, og eru tí flogfør fallin nógv í virði.

Um avskrivað varð øll árini 1989-91, hevði samlaða hallið verið umleið 42 mió. kr.

Í roknskapinum 1991 er eginognin í felagnum negativ við 17,2 mió, og við avskriving í 1991 er eginognin negativ 28 mió. kr.

Atlantic Airways hevur tí mist allan sín eginpening. P/F Flogleiðir, hvørs einasta aktiv er partabrøv í Atlantic Airways, hevur somuleiðis mist sína eginogn.

Felagið hevur kortini gjaldføri til at klára raksturin, tí eitt uttanlandslán við saldo pr. 31.12.91 á kr. 150.330.432,- er avdráttarfrítt í 5 ár og fellur ikki til gjaldingar fyrr enn miðskeiðis í 1994.

Sambært løgtingslóg nr. 29 frá 20 apríl 1989 er landsstýrinum heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri láni til Atlantic Airways upp á kr. 70 mió., og veðheldur landskassin fyri nevnda uttanlandsláninum sambært hesi lóg. Sum fíggjarstøðan er hjá felagnum, er givið, at veðhaldið verður effektivt.

Samlaðu útreiðslur landskassans í sambandi við Atlantic Airways, munnu tí fara at tátta upp í móti 83 mió. kr., umframt part av íløgum í flogvøll, hangar o.a.

Fleiri orsøkir eru til, at felagnum gongst so illa rakstrarliga, men tann avgerandi er óivað tann, at flogfarið ikki kann verða rentabult, so leingi sum tað størsta partin av árinum bert flýgur 4-5 tímar um dagin.

At illa gongst at fáa meira arbeiði til flogfarið kemst lutvíst av, at tað hevur støð í Føroyum, tí her er hvørki marknaður fyri útleigan av flogførum ella møguleikar til stovnan av nýggjum rutum, sum kunnu bera seg. Eisini er flogfarið bundið til føroyarutuna ta tíð av degnum, har bestu møguleikar eru at leiga út.

Viðmerkjast skal, at hóast flogfarið er ikki serliga hóskandi til chartarútleigan longri túrar, er tað tekniskt hitt best egnaða til Føroyarutuna. Upprunaliga var eisini ætlanin, at flogfarið bert skuldi flúgva á hesi rutu, og ferðafólkatalið var tá nóg høgt til, at flogfarið kundi bera seg við bara at flúgva á Føroyarutuni, men síðani 1989 er ferðafólkatalið á Føroyarutuni nógv minkað.

Í 1991 flugu um 80.000 á Føroyarutuni og av hesum fóru 47.000 (60%) við Atlantic Airways. Fyri at felagið skal bera høgu kapitalbyrðuna, er neyðugt, at 7-9.000 fleiri ferðafólk árliga flúgva við Atlantic Airways. Sum fíggjarvánirnar eru í løtuni, kann kortini ikki roknast við nakrari stórvegis øking í ferðafólkatalinum á føroyarutuni sum heild. Tí má ein øking fyrst og fremst fáast til vega við at marknaðarparturin hjá Atlantic Airways økist frá núverandi 60% til 70%. Í hesum sambandi er vert at nevna, at í meðal hevur Atlantic Airways økt um marknaðarpartin frá 1989 til 1991 við 5% árliga. Tó er ógjørligt at spáa um, um henda framgongd heldur fram, umframt at fólk alt meiri eru farin at nýta lágprísferðaseðlar, soleiðis at hóast ein framgongd er í ferðafólkatalinum, er ikki givið, at samlaðu inntøkurnar vaksa í sama mun.

Tryggingarsambandið Føroyar og Topdanmark, sum í felag veðhalda fyri útlendska lánveitaranum, krevja, at lánið verður niðurgoldið við í minsta lagi kr. 40 mió. beinanvegin. Orsøkin er m.a., at teir síggja ein vanda við, at marknaðarprísurin á flogfarinum nú einans er uml. kr. 91 mió. Tann ringa umtalan av Føroyum, serliga í Danmark, hevur óivað eisini gjørt sítt.

Rakstrarúrslitið hjá Atlantic Airways fyri árini 1990 og 1991 var áðrenn rentur ávikavist 11,6 og 15,2 mió. kr., meðan rentuútreiðsla o.l. hesi bæði árini var 13,2 og 15,7 mió. kr.

Áðrenn avskrivingar var rakstrarúrslitið sostatt hall upp á 1,6 mió. kr. fyri 1990 og 0,5 mió. kr. fyri 1991.

Út frá roknskapartølunum og útlitunum fyri felagið framyvir metir landsstýrið, at hóast landskassin leggur kr. 40 mió. út í ár, er framvegis vandi fyri seinni at skula leggja kr. 30 mió. út aftrat, tvs. at samlaða veðhaldið undir øllum umstøðum gerst effektivt.

Nú ræður um at fáa sum frægast burturúr. Landsstýrið sær í hesum sambandi tveir møguleikar:

1) Veðhaldið verður lagt út, og peningurin kravdur innaftur frá felagnum.
2) Landsstýrið teknar nýggjan partapening í felagið, ið verður nýttur til at niðurgjalda lánið, sum landsstýrið veðheldur fyri, og veðhaldsskyldan minkar svarandi til hesa upphædd.

Tá felagið er uttan eginogn, vil fyrra loysnin einans føra við sær, at landskassin noyðist at avskriva veðhaldsútleggið. Fyri landskassan er tí eingin fíggjarligur munur á loysn 1) og 2).

Fyri felagið hinvegin merkir loysn 1), at samlaða lánibyrðan er tann sama, og vánaligt útlit eru til, at raksturin kann bera hesa lánibyrðu.

Landsstýrið metir tí, at bert loysn 2) loysir fíggjarligu trupulleikarnir upp á langt sikt. Landsstýrið ætlar tí at tekna kr. 75 mió. í nýggjum partapeningi, sum partvís (kr. 70 mió.) verður nýttur til at niðurgjalda skuldina við, samstundis sum veðhaldið fellur burtur, og partvís verður nýttur til ískoytisgjaldføri hjá felagnum.

Tá felagið vónandi fer at geva avlop, verða møguleikar hjá landskassanum at fáa endurgoldið nakað av partapeninginum sum vinningsbýti.

Tryggingarsambandið og Topdanmark eru eisini sinnað fyri hesi loysn og hava givið tilsøgn til eitt lán uppá kr. 75 mió. treytað av, at tær kr. 70 mió. fara til at niðurgjalda lánið hjá Atlantic Airways.

Tíðarfrestin til góðtøku av hesum tilboði hava feløgini sett til 30. november 1992.

Landsstýrið og lángevarin eru eisini komnir ásamt um, at framyvir eigur nevndin í partafelagnum bert at hava 3-5 limir, og vil landsstýrið tryggja sær, at lángevarin góðtekur hesar og at ein óheft konsulentfyritøka skal gjøgnumganga raksturin við møguligum effektiviseringum og rationaliseringum fyri eygað.

Konsulentfyritøkan skal eisini gera kanningar viðvíkjandi dagligu leiðsluni av fyritøkuni og leiðbeina leiðsluna framyvir.

Ætlanin er at halda aðalfund í P/F Atlantic Airways har nevnd verður vald, eins og virðið á verandi partabrøvum verður niðurskrivað til kr. 0,- og landskassin nýteknar kr. 75 mió. í partapeningi. Samstundis verður P/F Flogleiðir avtikið, tá felagið ikki hevur nakað endamál longur.

**Avleiðingar fyri fíggjarlógina**

Hallið á landskassaroknskapinum fyri fíggjarløgtingslógina fyri 1992 veksur við kr. 75 mió við hesi lóg. Í eykafíggjarlógini fyri 1992 verður upphæddin bókað sum eykajáttan á grein 13, samskifti.

Hinvegin minka landskassans veðhaldsskyldur við kr. 70 mió., og í 1993 ella 1994 verður ikki longur neyðugt við hesi játtan á grein 21, (effektivar veðhaldsskyldur).

Partabrøvini verða bókað á landskassaroknskapinum við tí virði, sum tey hava í mun til eginognina í felagnum, tvs. uml. kr. 47 mió. Partabrøvini í P/F Flogleiðum verða hinvegin avskrivað sum virðisleys og minkar ogn landskassans kr. 12,2 mió., sum er virðið, tey eru bókað til á landskassaroknskapinum.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 55/1992: Løgtingslóg um nýtekning av partapeningi í P/F Atlantic Airways.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 25. november 1992 og eftir 1. viðgerð 27. november 1992 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið sama dag og innkallaði stjóran fyri Grannskoðanardeild Landskassans, Leivur Harryson, og grannskoðaran fyri P/F Atlantic Airways, Carl Vilhelm Weyhe.

Grannskoðari felagsins legði fram roknskap fyri árið 1991 og fyri tíðarskeiðið 1. januar - 31. oktober 1992. Greitt var frá taltilfarinum. Upplýst varð, at hóast vøkstur í ferðafólkatalinum, betrar hetta ikki um úrslitið vegna broyttar ferðaseðlaskipanir. Nevndin sett fyrispurningar til báðar grannskoðararnar, har serliga varð nomið við spurningin, um nakað kundi sigast, um nú eitt hvørt varð fjalt í fyriliggjandi skjalatilfari viðvíkjandi veruligu fíggjarligu gongdini í einum felag, har fíggjarnevndin hevur eina serliga ábyrgd, tá talan er um almennan pening. Nevndin tók til eftirtektar, at einki slíkt fyriliggur, meðan nevndin samstundis ásannar, at grannskoðararnir høvdu hvør sína uppfatan av ávísum relevantum roknskaparprinsippum. Grannskoðari felagsins upplýsti, at roknskaparprinsippini vórðu broytt eftir áheitan frá núsitandi nevnd og stjóra.

Viðvíkjandi teimum treytum, ið leiðslan í Atlantic Airways eigur at liva upp til í samband við, hvat dentur varð lagdur á, tá P/F Atlantic Airways yvirtók partin

hjá danska flogfelagnum Cimber Air, var landsgrannskoðarin av tí fatan, at hesi krøv ikki vórðu hildin í neyðugt mát. Fíggjarnevndin legði tí dent á at umrøða spurningin um tær treytirnar, um at raksturin skal hvíla í sær sjálvum, ið settar vórðu frá løgtinginum, tá felagið varð stovnað, eru beint uppfyltar. Nevndin var samd um, at tað er uppgáva fyri landsgrannskoðaran, fíggjarnevndina, nevnd felagsins og stjóra at viðgera hesar spurningar sera gjølla og at fáa hesi viðurskifti í samljóð við ta ætlan, sum liggur í uppruna løgtingslógini viðvíkjandi Atlantic Airways. Nevndin hevur umrøtt tað í løtuni aktuella metingarvirðið av flogfarinum, 91 mió. kr.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Vilhem Johannesen, Dan Petersen, Anfinn Kallsberg, Birgir Danielsen, Finnbogi Ísakson og Asbjørn Joensen), mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins, tó við eini minni tekniskari broyting orsakað av, at upprunalógin sambært uppskoti landsstýrisins verður sett úr gildi og er tí neyðugt at seta eina endamálsorðing í fyriliggjandi landsstýrisuppskot.

Meirilutin leggur allan dent á, at nýtslan av flogfarinum verður víðkað møguliga við, at samstarv fæst við aðrar.

Meirilutin ger vart við tað rímiliga, at P/F Atlantic Airways í framtíðini fær eina nevnd, har limir hvør á sínum øki hava kunnleika til búskap og flúgving á altjóða støði, og at kanningar fara fram av leiðsluhátti felagsins, sum skal gjøgnumganga raksturin við effektiviseringum og rationaliseringum fyri eyga.

Neyðug tiltøk verða gjørd, so raksturin av felagnum fer at bera seg í framtíðini, og at fíggjarnevnd løgtingsins við jøvnum millumbili fær frágreiðing frá partafelagnum um felagsins rakstur.

Neyðugt verður í framtíðini at samarbeiða við aðrar, serstakliga nú marknaðurin letur upp á øllum økjum, og at nevnd og leiðsla fer meira miðvíst til verka, tá tað snýr seg um tílíkar spurningar.

Minnilutin (Finnbogi Arge) vísir til viðmerkingar Sambandsfloksins undir 1. viðgerð og setir einki uppskot fram.

Meirilutin setir fram soljóðandi:

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Heitt verður á landsstýrið um at umhugsa at skipa ein grunn, sum eigur partapeningin í Atlantic Airways.

Tá løgtingið áður hevur bundið seg við veðhaldi fyri P/F Atlantic Airways er peningurin, ið settur verður í partafelagið, mistur, um felagið heldur uppat.

Av lógartekniskum orsøkum setir meirlutin fram soljóðandi:

**broytingaruppskot**

**til**

**uppskot landsstýrisins**

§ 1 verður orðað soleiðis:

"Við tí endamáli at reka og taka lut í flogferðslu, verður landsstýrinum heimilað landskassans vegna at tekna kr. 75.000.000,- í partapeningi í P/F Atlantic Airways treytað av, at veðhald landskassans fyri lán til felagið verður strikað."

§ 1 formuleres:

"Med det formål at drive og deltage i luftfart bemyndiges landsstyret på landskassens vegne at tegne aktiekapital pålydende kr. 75.000.000, - i P/F Atlantic Airways, på betingelse af, at landskassens garanti for lån til selskabet ophæves."

# 56. Løgtingslóg um kærunevnd í almannamálum

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um kærunevnd í almannamálum.*

*lagtingslov om socialt ankenævn.*

**Virkisøki og skipan nevndarinnar.**

**§ 1. Við heimild í**

1) Lov for Færøerne om offentlig forsorg, § 33, stk.6,
2) Lov for Færøerne om invalidepension m.v., § 35, stk. 4,
3) Lov for Færøerne om folkepension m.v., § 32, stk.4,
4) Lov for Færøerne om dagpenge ved sygdom eller fødsel, § 31, stk.3,

**Ankenævnets virkeområde og organisation.**

**§ 1. Med hjemmel i**

1) Lov for Færøerne om offentlig forsorg, § 33, stk. 6,
2) Lov for Færøerne om invalidepension m.v., § 35, stk. 4,
3) Lov for Færøerne om folkepension m.v., § 32, stk.4,
4) Lov for Færøerne om dagpenge ved sygdom eller fødsel, § 31, stk. 3,

5) Lov for Færøerne om børneforsorg, § 7, stk. 5,

verður heimild landsstýrisins sum kærumyndugleiki lagdur til kærunevndina í almannamálum, sum skal viðgera og taka endaliga avgerð í kærumálum sambært teimum í nr. 1 - 5 nevndu lógunum.

**Stk. 2.** Herumframt viðger kærunevndin, sambært ásetingunum í hesi lóg, kærur um avgerðir, sum tiknar eru sambært:

1) Løgtingslóg um uppískoytisveiting til einkjur, § 5, stk. 2,
2) Løgtingslóg um samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima, § 2, stk. 2, 2. pkt.,
3) Løgtingslóg um bjálvingarstuðulslán til pensionistar, § 12, stk. 2.

**Stk. 3.** Avgerðir í málum, sum tiknar eru av kommunalari sosialari deild, kunnu innan 4 vikur kærast til Almannastovuna.

**Stk. 4.** Avgerðir í málum, sum Almannastovan hevur tikið, antin sum viðgerðarmyndugleiki ella sum kærumyndugleiki smb. stk. 3, og avgerðir hjá útdeildum hjá Almannastovuni kunnu innan 4 vikur kærast til kærunevndina í almannamálum. Freistin verður roknað frá tí degi, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina.

**Stk. 5.** Í serligum førum kann kærunevndin viðgera kærumál, ið er innlatið aftaná, at kærufreistin er úti.

**Stk. 6.** Avgerðin hjá kærunevndini í almannamálum er endalig.

5) Lov for Færøerne om børneforsorg, § 7, stk. 5,

er landsstyrets beføjelser som ankeinstans henlagt til det sociale ankenævn, som skal behandle og træffe den endelige administrative afgørelse i klagesager i henhold til de i nr. 1 - 5 nævnte love.

**Stk. 2.** Herudover behandler ankenævnet, jvf. bestemmelserne i denne lov, klagesager vedrørende afgørelser, der er truffet i henhold til:

1) Lagtingslov om tillægsydelse til enker, § 5, stk. 2,
2) Lagtingslov om vederlag for pleje af ældre og hjælpeløse personer hjemme, § 2, stk. 2, 2. pkt.,
3) Lagtingslov om isoleringstilskudslån til pensionister, § 12, stk. 2.

**Stk. 3.** Afgørelser, som er truffet af en kommunal socialforvaltning, kan inden 4 uger indbringes for Almannastovan.

**Stk. 4.** Afgørelser, som er truffet af Almannastovan, enten som den behandlende myndighed eller som ankeinstans jvf. stk. 3, og afgørelser, som er truffet af en afdeling af Almannastovan, kan inden 4 uger indbringes for det sociale ankenævn. Fristen regnes fra den dag, hvor klageren har fået meddelelse om afgørelsen.

**Stk. 5.** I særlige tilfælde kan ankenævnet behandle klagesager, som er indbragt efter klagefristens udløb.

**Stk. 6.** Det sociale ankenævn har den endelige administrative afgørelse.

§ 2.

Í kærunevndini sita 3 limir, sum landsstýrið velur. Ein limur skal vera lækni, ein løgfrøðingur og ein sosialráðgevi. Landsstýrið tilnevnir formannin. Fyri hvønn nevndarlimin verður valdur ein varalimur. Starvstíðin hjá nevndarlimum og varalimum er 4 ár.

**Stk. 2.** Fólk, sum eru í almennum starvi innan sosiala økið, og sum har starvast við málsviðgerð ella líknandi, kunnu ikki veljast sum limir í kærunevndini.

**Stk. 3.** Kærunevndin kann fáa sær neyðuga serkøna hjálp í serliga margbroyttum og truplum málum. Hesi fáa løn ella samsýning, sum landsstýrið ásetir.

**Stk. 4.** Nevndarlimirnir fáa løn ella samsýning, sum landsstýrið ásetir.

§ 3.

Kærunevndin tekur avgerð í teimum málum, ið verða løgd fyri nevndina.

**Stk. 2.** Kærunevndin er viðtøkufør, tá allir limir/varalimir eru møttir.

**Stk. 3.** Avgerðir nevndarinnar verða tiknar við vanligum meiriluta. Standa atkvøðurnar á jøvnum, er atkvøða formansins avgerandi. Formaðurin hevur skyldu til at greiða atkvøðu.

§ 4.

Kærunevndin eigur eftir áheitan ella kann av sínum eintingum geva pørtunum høvi til at siga fram sína áskoðan munnliga fyri kærunevndini.

**Stk. 2.** Somuleiðis kann kærunevndin biðja áhugafeløg, fakfeløg o.l. fel-

§ 2.

Ankenævnet består af 3 medlemmer, der vælges af landsstyret. Et medlem skal være læge, en jurist og en socialrådgiver. Landsstyret udnævner formanden. For hvert medlem vælges en suppleant. Medlemmer og suppleanter vælges for 4 år ad gangen.

**Stk. 2.** Personer, der er i offentlig stilling indenfor socialforvaltningen, og som dér er beskæftiget med sagsbehandling el. lign., kan ikke vælges som medlemmer i ankenævnet.

**Stk. 3.** Ankenævnet kan i særlige vanskelige og indviklede sager få nødvendig bistand fra særligt kyndige personer. Disse aflønnes med et af landsstyret fastsat honorar.

**Stk. 4.** Landsstyret fastsætter medlemmernes løn eller honorar.

§ 3.

Ankenævnet træffer afgørelse i de sager, der indbringes for nævnet.

**Stk. 2.** Ankenævnet er beslutningsdygtigt, når alle medlemmer/suppleanter er til stede.

**Stk. 3.** Ankenævnets afgørelser træffes ved almindelig stemmeflerhed. Ved stemmelighed er formandens stemme udslagsgivende. Formanden er forpligtet til at stemme.

§ 4.

Ankenævnet bør efter begæring eller kan af egen drift give parterne adgang til mundtligt at udtale sig for nævnet.

**Stk. 2.** Ligeledes kan ankenævnet anmode interesseorganisationer, fagforeninger o.l. foreninger om at give møde

agsskapir um at koma á fund við kærunevndina, tá meira týðandi mál innan virkisøki felaganna eru til viðgerðar.

§ 5.

Eingin limur má taka lut í viðgerð av kærumálum, sum viðvíkja:

1) honum sjálvum ella hjúnafelaga hansara,
2) nøkrum, ið er skyldur ella svágdur við hann í beinan ættlegg upp- ella niðureftir, systkin hansara ella hjúnafelaga teirra, ættleidd børn hansara ella fosturbørn, ella ættleiðingar- ella fosturforeldur hansara,
3) felagi ella felagskapum v.m., sum hann er nevndar- ella stjórnarlimur í, ella hjá løgfrøðisligum persóni ella felagi osfr., sum hann er knýttur at, tá hesin kann hava áhuga í úrslitinum av málinum,
4) avgerðum, sum hann annars hevur persónligan áhuga í úrslitinum av, ella er umboð fyri onkran, ið hevur áhuga í úrslitinum,
5) málum, tá umstøðurnar gera, at luttøka limsins í viðgerðini kann sáa iva millum manna um óheftu støðu hansara.

for ankenævnet, når væsentlige og principielle sager vedrørende foreningernes virkeområde er til behandling.

§ 5.

Ingen må deltage i behandling af klagesager, der vedrører:

1) ham selv eller hans ægtefælle,
2) hans beslægtede eller besvogrede i op- eller nedstigende linie, hans søskende eller disses ægtefæller, hans adoptiv- eller plejebørn eller hans adoptiv- eller plejeforældre,
3) Et selskab eller en forening m.v., af hvis bestyrelse eller direktion han er medlem, eller hos en juridisk person eller selskab m.v., vedkommende har nær tilknytning til, og som kan have særlig interesse i sagens udfald,
4) afgørelser, hvor han i øvrigt har personlig interesse i udfaldet, eller er repræsentant for nogen, som har interesse i udfaldet,
5) sager, når forholdene er egnede til at skabe tvivl om medlemmets fuldstændige upartiskhed.

**Skrivstova kærunevndarinnar.**

§ 6.

Kærunevndin hevur sjálvstøðuga skrivstovu, sum skal fyrireika tey mál, ið skulu viðgerast í kærunevndini. Landsskrivstovan veitir ta neyðugu skrivstovutænastuna.

**Ankenævnets sekretariat.**

§ 6.

Ankenævnet har egct sekretariat, som skal forberede de sager, som skal behandles af ankenævnet. Landsstyrets administration (Landsskrivstovan) yder nødvendig kontorservice.

**Stk. 2.** At taka sær av dagliga arbeiðinum á skrivstovuni og at vera fastur skrivari hjá kærunevndini í almannamálum setir landsstýrið eitt fólk, ið skal hava løgfrøðisligt embætisprógv ella líknandi.

**Stk. 3.** Virkisøki skrivstovunnar kann víðkast til onnur kæruøki við serligari lóggávu.

§ 7.

Kæra til kærunevndina í almannamálum skal sendast skrivliga til skrivstovu kærunevndarinnar og skal so vítt møguligt styðja seg við grundir og verða prógvskjøl hjáløgd.

**Stk. 2.** Skrivstovan ansar eftir, at allar upplýsingar - so sum ummæli, váttanir o.a., ið verða mettar neyðugar fyri at kunna viðgera og taka avgerð í málinum, verða fingnar til vega, áðrenn málið verður lagt fyri kærunevndina.

**Stk. 3.** Tann myndugleiki, ið hevur tikið ta innkærdu avgerðina, hevur skyldu til at lata skrivstovu kærunevndarinnar allar upplýsingar, sum hava verið grundarlag undir tí innkærdu avgerðini.

**Stk. 4.** Landsstýrið ásetir nærri reglur um starvsskipan hjá skrivstovu kærunevndarinnar.

**Kærunevndarinnar avgerð,**

§ 8.

Kærunevndarinnar avgerð kann vera: burturvísing, staðfesting, avtøka ella broyting av tí kærdu avgerðini. Kærunevndin kann eisini afturvísa málið til nýggja viðgerð ella beina málið til við-

**Stk. 2.** At tage sig af det daglige arbejde på sekretariatet og at være fast sekretær for det sociale ankenævn ansætter landsstyret en person, som skal have bestået juridisk kandidateksamen el.lign.

**Stk. 3.** Sekretariatets virkeområde kan ved lov udvides til at omfatte andre klagesager.

§ 7.

Klage til ankenævnet skal indsendes skriftligt til ankenævnets sekretariat og skal så vidt muligt være begrundet og vedlagt dokumentation.

**Stk. 2.** Sekretariatet påser, at alle oplysninger - så som udtalelser, attester o.a., som må anses for nødvendige for at kunne behandle og træffe afgørelse i sagen, er tilvejebragt, inden sagen bliver forelagt ankenævnet.

**Stk. 3.** Den myndighed, som har truffet den indankede afgørelse, er forpligtet til at give ankenævnets sekretariat alle oplysninger, som har udgjort grundlaget for den trufne afgørelse.

**Stk. 4.** Landsstyret fastsætter nærmere regler om forretningsorden for ankenævnets sekretariat.

**Ankenævnets afgørelser.**

§ 8.

Ankenævnets afgørelser kan gå ud på: afvisning, stadfæstelse, ophævelse eller ændring af den påklagede afgørelse. Ankenævnet kan endvidere hjemvise sagen til fornyet behandling eller hen-

gerðar hjá einum myndugleika, sum ikki áður hevur tikið avgerð í málinum.

**Stk. 2.** Kærunevndin er ikki bundin av málskrøvum partanna.

**Stk. 3.** Kærunevndin kann geva skrivstovuni fulltrú til sjálvstøðugt ella saman við formanninum at taka avgerð í málum,

1) har avgerðin verður mett ivaleys,
2) har talan er um brádliga fkomna trongstøðu,
3) og har tað má metast at verða kæraranum til munandi skaða um bíðast skal eftir viðgerð í kærunevndini.

**Stk. 4.** Avgerðir sambært stk. 3 skulu skjótast gjørligt leggjast fyri kærunevndina til kunningar.

vise den til behandling hos en myndighed, der ikke tidligere har truffet afgørelse i sagen.

**Stk. 2.** Ankenævnet er ikke bundet af parternes påstande.

**Stk. 3.** Ankenævnet kan bemyndige sekretariatet til selvstændigt eller sammen med formanden at træffe afgørelse i sager,

1) hvis afgørelse må anses som utvivlsom,
2) hvor der er tale om en øjeblikkelig opstået trangsituation,
3) og hvor en afventning af behandling i ankenævnet må påregnes at medføre væsentlig skade for klageren.

**Stk. 4.** Afgørelser i henhold til stk. 3 skal hurtigst muligt forelægges ankenævnet til orientering.

**§ 9.**

Avgerðir kærunevndarinnar skulu fráboðast skrivliga og skulu vera grundaðar.

**Stk. 2.** Avgerðir kærunevndarinnar kunnu verða almannakunngjørdar eftir reglum, ið landsstýrið ásetir.

**§ 9.**

Ankenævnets afgørelser udfærdiges skriftligt og skal være ledsaget af en begrundelse.

**Stk. 2.** Ankenævnets afgørelser kan offentliggøres efter regler, der fastsættes af landsstyret.

**Tagnarskylda.**

**§ 10.**

Ein og hvør, ið luttekur í málsviðgerð sambært hesi lóg, hevur tagnarskyldu um alt, hann fær kunnleika til undir viðgerðini av málinum.

**Tavshedspligt.**

**§ 10.**

Enhver, der deltager i sagsbehandlingen efter denne lov, har tavshedspligt med hensyn til, hvad han erfarer ved sagens behandling.

**Skiftisreglur og ígildiskoma.**

**§ 11.**

Hendan lóg fær gildi 1. januar 1993.

**Stk. 2.** Kærur smb. § 1, sum verða móttiknar frá og við 1. januar 1993 verða viðgjørdar og avgreiddar av kærunevndini sambært reglunum í hesi lóg.

**Stk. 3.** Kærur, sum landsstýrið hevur móttikið til og við 31. desember 1992, verða viðgjørdar og avgreiddar av landsstýrinum.

**Stk. 4.** Sum móttøkudagur verður roknaður tann dagur, tá kæran er stemplað sum móttikin.

**Overgangsbestemmelser og ikrafttræden.**

**§ 11.**

Denne lov træder i kraft 1. januar 1993.

**Stk. 2.** Klager jvf. § 1, som modtages fra og med 1. januar 1993 behandles og ekspederes af det sociale ankenævn i henhold til reglerne i denne lov.

**Stk. 3.** Klager, som modtages af landsstyret til og med 31. december 1992, behandles og ekspederes af landsstyret.

**Stk. 4.** Som modtagelsesdag regnes den dag, hvor klagen er indstemplet som modtaget.

**Viðmerkingar:**

Tað hevur leingi og frá ymiskum síðum verið eitt ynski at fáa eina aðra kæruskipan fyri almannamál. Bæði innan almannaverkið, millum borgarar, í landsumsitingin og løgtinginum hevur hesin spurningur við jøvnum millumbilum stungið seg upp.

Við galdandi skipan er tað landsstýrið, sum er kærumyndugleiki í flest øllum kærum sambært almannalóggávuni. Herumframt er landsstýrið hægsti fyrisitingarligi myndugleiki fyri almannaverkið sum heild, og tí eisini seinasti fyrisitingarligi kærumyndugleiki fyri avgerðir, sum stovnarnir innan almannaverkið taka.

Tað kann vera óheppið, at landsstýrið bæði hevur ábyrgdina av at gera tær meiri yvirordnaðu reglurnar viðvíkjandi almannalóggávuni, og samstundis skal taka avgerð í konkretum kærumálum sambært somu lóggávu. Men tað sum óivað hevur fallið mongum fyri bróstið er, at tað er tann politiski myndugleikin, sum tekur avgerðirnar í kærumálum.

Meðan landsstýrið bæði sum politiskur og fyrisitingarligur myndugleiki í kunngerðum og leiðbeinandi reglum meira alment eigur at boða frá, hvussu tær ymisku lógirnar eiga at tulkast, og hvussu eigur at farast fram innan ávís øki o.s.fr., so er ein avgerð í einum kærumáli oftani tengt at eini ógvuligari konkretari meting í tí serstaka førinum. Tað kann koma fyri, at avgerðin víkur frá teimum høvuðsreglum, sum fastlagdar eru í kunngerðum o.l. Hetta er í sjálvum sær onki løgið í, tí tað vil altíð vera so, at í nøkrum førum viðførir høvuðsregulin eitt óheppið úrslit.

Men av tí at landsumsitingin higartil ikki hevur havt orku til at gera tær neyðugu leiðbeinandi reglurnar viðvíkjandi almannalóggávuni, hevur hendan dupultfunktiónin hjá landsstýrinum havt við sær, at tey "politisku signalini" til umsitingina (Almannastovuna), sum annars áttu at verði givin í kunngerðum og leiðbeinandi reglum, tíðum eru løgd í kæruavgerðirnar. Við tað at kæruviðgerðin grundstøðiliga má roknast at vera eitt fyrisitingarligt mál, er tað sjálvsagt óheppið, tá tann politiska funktiónin hjá landsstýrinum verður tvinnað saman við hesi avgreiðslu.

Fyriliggjandi uppskot skuldi bøtt munandi um hesi viðurskifti. Við hesum verður kærumyndugleikin hjá landsstýrinum lagdur til eina sjálvstøðuga og óhefta kærunevnd, sum er samansett av fakfólki. At fyrireika málini og annars vera kærunevndini til hjálpar verður settur ein juristur e.l. Avgerðirnar hjá kærunevndini eru endaligar, og kunnu tí ikki kærast víðari til landsstýrið.

Við hesari skipan kemur tað at vera heilt avgerandi neyðugt, at landsstýrið ger kunngerðir, rundskriv og leiðbeinandi reglur til umsitingina at arbeiða eftir. Tað er tó lítil ivi um, at hetta skuldi verðið væl gjørligt, tí higartil hevur avgreiðsla av kærumálum tyngt munandi um landsumsitingina. Verður tann orkan, ið higartil er løgd í kæruviðgerð, í staðin brúkt til at gera yvirordnaðar reglur, so eigur tað regluskapandi arbeiðið uttan trupulleikar at kunna verða gjørt.

Saman við uppskotinum verða løgd fram 2 onnur uppskot um lógarbroytingar, og eru hetta fylgisbroytingar til uppskotið um kærunevnd í almannamálum. Hesi uppskot hava við sær, at kærur sambært føroyskum løgtingslógum innan almannaøki, eisini verða lagdar inn undir virkisøkið hjá kærunevndini í almannamálum.

Uppskotið til løgtingslóg um kærunevnd hevur verið sent til ummælis hjá Almannastovuni, Føroya Kommunufelag, Tórshavnar býráð, Sosialráðgevarafelag Føroya, Meginfelag teirra brekaðu og Landfelag Pensionistanna.

Ummælini eru hjáløgd sum skjøl til uppskotið og skal landsstýrið gera hesar viðmerkingar til ummælini:

Almannastovan, Tórshavnar býráð og Sosialráðgevarafelag Føroya vísa á, at eisini avgerðirnar hjá kommunalum sosialum deildum og útdeildum hjá Almannastovuni eiga at kunna kærast beinleiðis til Kærunevndina. Landsstýrið tekur undir við hesum uppskotinum, og er tað tí í uppskotinum til løgtingslóg um kærunevnd ásett, at eisini avgerðir hjá útdeildum hjá Almannastovuni kunnu kærast beinleiðis til kærunevndina. Viðvíkjandi teimum kommunalu sosialu deildunum er tað tó í teimum flestu av núgaldandi almannalógunum ásett, at avgerðirnar hjá hesum deildum fyrst eiga at verða kærdar til Almannastovuna. Avgerðin hjá Almannastovuni kann síðani aftur kærast til kærunevndina. Landsstýrið ásannar, at tann einklasta skipanin var, at eisini avgerðirnar hjá kommunalu sosialu deildunum kundu kærast beinleiðis til kærunevndina, men er tað

sum frammanfyri nevnt ikki heimild til tess við galdandi lóggávu. Sum er hava vit einans eina kommunala sosiala deild, og tað er í Tórshavnar kommunu.

Um kommunurnar eru sinnaðar til tess, vil landsstýrið arbeiða fram ímóti at fáa lógarbroytingar framdar, soleiðis at ein eins kæruskipan verður galdandi fyri allar myndugleikar.

MBF hevur skotið upp, at kærunevndin verður víðkað við umboðum fyri brúkaran. Landsstýrið hevur ikki tikið hetta uppskotið frá MBF við í lógaruppskotinum. Orsøkin er, at brúkararnir av almannalóggávuni eru ógvuliga ymiskir; ung, gomul, brekað, sjúk, børn, einkjur v.m. Tað er tí trupult at finna fá umboð, sum kunnu sigast at umboða brúkaran av almannalóggávuni. Fyri at geva brúkaranum og øðrum høvi til at gera síni sjónarmið galdandi í samband við kærumál, hevur landsstýrið tí í staðin fyri skotið upp, at brúkarin og serstakir áhugabólkar o.o. skulu hava høvi til at bera fram sína áskoðan fyri kærunevndini.

**Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar.**

**Ad § 1.**

**Stk. 1:** Í hesum fólkatingslógunum er løgtinginum og landsstýrinum heimilað at leggja kærumyndugleikan sambært lógunum til eina kærunevnd, sum hevur endaligu fyrisitingarligu avgerðina. T.v.s. at avgerðin hjá kærunevndini í almannamálum ikki kann kærast víðari til t.d. landsstýrið.

**Stk. 2:** Sambært hesum løgtingslógunum er landsstýrið í dag kærumyndugleiki. Saman við uppskotinum um løgtingslóg um kærunevnd í almannamálum, verður tí eisini lagt fram uppskot um løgtingslóg um broyting av ymiskum almannalógum, sum inniber, at kærunevndin í almannamálum verður endaligi fyrisitingarligi kærumyndugleiki sambært hesum løgtingslógunum frá 1. januar 1993.

**Stk. 3:** Í avgerðum, sum tiknar eru av eini kommunalari sosialari deild, er 1. Almannastovan og 2. kærumyndugleiki kærunevndin í almannamálum.

**Stk. 4:** Allar avgerðir hjá Almannastovuni kunnu kærast til kærunevndina í almannamálum, tvs. bæði tá Almannastovan hevur tikið avgerð sum kærumyndugleiki í einum kærumáli viðvíkjandi eini avgerð hjá eini kommunalari deild, og avgerðin í teimum málum, sum eru viðgjørd og avgjørd beinleiðis av Almannastovuni.

**Stk. 5:** Kærufreistin er í øllum førum sett til 4 vikur. Hetta merkir, at tann sum avgerðin viðvíkur, kann kæra avgerðina innan 4 vikur eftir, at hann hevur fingið fráboðan um avgerðina. Freistin byrjar vanliga frá dagfestingini av tí skrivligu fráboðanini um avgerðina + 3 dagar.

Verður ein kæra latin inn aftaná, at kærufreistin er úti, verður kæran avvíst sum innlatin ov seint. Kann tað tó vísast á serligar orsøkir til, at kæran er latin inn ov

seint, ella fyriliggur tað eftir metingini hjá kærunevndini eitt serstakt føri, so kann kærunevndin viðgera kæruna, hóast hon er innlatin ov seint.

Talan kann t.d. vera um, at ongin kæruvegleiðing er givin, at postflutningurin av onkrari orsøk er ella hevur verið óregluligur, at avgerðin er fráboðað í summarfrítíðini, ella um tað skilliga sæst, at avgerðin, sum tikin er, ikki er rætt.

Í metingini verður eisini dentur lagdur á, hvussu nógv ov seint kæran er latin inn. Sum høvuðsregla kann sigast, at jú longri tíð, tað gongur frá, at freistin er úti, tess betri skal grundgevingin vera fyri at viðgera málið.

**Stk. 6:** Avgerðin, sum kærunevndin tekur, er endalig og kann sostatt ikki kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika.

**Ad § 2.**

**Stk. 1:** Kærunevndin hevur 3 limir, sum eru fakfólk. Landsstýrið velur limirnar og tilnevnir formannin.

Limirnir verða valdir fyri 4 ár. Starvstíðin hjá kærunevndini er ikki tengd at løgtingsvalskeiðinum. Fyrstu limirnir í kærunevndini virka sostatt frá 1. januar 1993 og verða sitandi til 31. desember 1996.

**Stk. 2:** Fólk, sum beinleiðis hava við málsviðgerð av sosialum málum at gera, kunnu ikki veljast sum limir. Grundgevingin er, at vandi er fyri, at hesi ov ofta verða inhabil, og annars eru ov tætt knýtt til avgerðarstovnin. Hetta merkir stórt sæð, at starvsfólk á Almannastovuni, á útdeildum og kommunalum sosialum deildum ikki kunnu veljast sum limir.

**Stk. 3:** Hendan heimildin eigur einans at verða brúkt í heilt serligum førum. Ætlanin er, at í serliga truplum og fløktum málum kann kærunevndin fáa sær serkøna hjálp fyri at fáa eitt betri og greiðari grundarlag undir støðutakanini í málinum. Talan kann t.d. vera um, at fáa ein roknskaparkønan at stilla upp ein roknskap, ella ein løgfrøðing at gera responsum um ein serliga fløktan og ivasaman lógarspurning, ella at fáa óvildugar læknaligar metingar.

Landsstýrið ásetir ta samsýning, sum hesi serkønu kunnu fáa. Talan verður um at áseta reglur um ávísan tímatakst og mestuupphæddir fyri eitt einstakt mál.

**Stk. 4:** Ætlanin er, at nevndarlimirnir skulu fáa eina fasta samsýning fyri nevndararbeiðið.

**Ad § 3.**

**Stk. 1:** Kærunevndin skal taka avgerð í teimum málum, sum verða løgd fyri nevndina.

**Stk. 2:** Kærunevndin skal vera fullmannað fyri at kunna taka avgerð. Kann nevndarlimur ikki møta, skal varalimur hansara møta.

**Stk. 3:** Hetta merkir, at atkvøða 2 limir fyri, so er avgerðin samtykt. Um 1 limur ikki ynskir at atkvøða, soleiðis at tað stendur á jøvnum í atkvøðum, so er formansins atkvøða avgerandi.

Formaðurin hevur skyldu til at greiða atkvøðu. Um 2 limir ikki atkvøða, so er málið fallið. Hetta merkir, at tað ikki hevur verið møguligt at taka eina avgerð í málinum, sum tí eigur at verða útsett til komandi fund við viðmerking um, hvørjar grundirnar eru fyri, at 2 limir ikki hava kunnað/ viljað tikið støðu.

**Ad § 4.**

**Stk. 1:** Kærunevndin kann sjálv og eigur eftir áheitan frá antin kæraranum ella tí myndugleika, sum hevur tikið ta innkærdu avgerðina, at geva teimum høvi til at koma á fund við kærunevndina fyri at greiða og lýsa kærumálið munnliga.

Hevur annar parturin verið á fundi við kærunevndina, eigur hin parturin í málinum at fáa fráboðan um hetta og eisini fáa høvi til at greiða frá sínum sjónarmiðum, áðrenn avgerð verður tikin í málinum.

Kærunevndin kann eisini biðja báðar partarnar um at møta samstundis á fundi við kærunevndina.

**Stk. 2:** Kærunevndin kann biðja ymiskar áhugafelagskapir um at koma at greiða frá teirra sjónarmiðum, tá meira týðandi og grundstøðilig mál innan virkisøkið hjá feløgunum eru til viðgerðar i kærunevndini.

**Ad § 5.**

**Stk. 1:** Í hesi grein er ásett, nær ein nevndarlimur er inhabilur, og tí ikki kann luttaka í viðgerðini av ávísum máli.

Nevndarlimur eigur sjálvur at boða formanninum frá, um hann er ella metir seg vera inhabilan í einum máli. Tá so er, skal varalimur hansara møta á fundi í hansara stað.

**Ad § 6.**

**Stk. 1:** Ætlanin er, at kærunevndin skal hava skrivstovu á Landsskrivstovuni. Skrivstovan verður sjálvstøðug og skal í tí dagliga arbeiðinum virka undir ábyrgd av kærunevndini.

**Stk. 2:** Ein løgfrøðingur ella líknandi verður settur sum fulltrúi á hesi skrivstovuni. Hesin verður ikki at meta sum leiðari e.l., men arbeiðir undir ábyrgd av kærunevndini. Meiningin er ikki at seta fleiri fólk. Við nýtímans telduútgerð verður mett, at fulltrúin kann klára alt arbeiðið sjálvur. Roknast má tí við, at neyðugt verður at avmarka telefonavgreiðslutíðina soleiðis, at hendan einans verður annaðhvørt fyrrapart ella seinnapart í nakrar tímar.

**Stk. 3:** Um tað verður mett ynskiligt, er møguligt, at arbeiðsøkið hjá skrivstovuni eisini kann víðkast til at fyrireika mál fyri aðrar kærunevndir.

**Ad § 7.**

**Stk. 1:** Grundarlagið fyri eini kæru skal vera skrivligt. Herumframt skal kærarin so vítt møguligt greiða frá, hví hann er ónøgdur við avgerðina. Skjøl, ið kunnu vátta upplýsingarnar frá kæraranum, skulu eisini leggjast við.

**Stk. 2:** Skrivstovan hevur ábyrgdina av, at kærumálið verður so væl lýst, sum til ber, og at allar neyðugar upplýsingar eru til staðar, áðrenn málið verður lagt fyri kærunevndina til støðutakan.

Vanliga mannagongdin er, at tann myndugleiki, sum hevur tikið avgerðina, verður biðin um at senda tey skjøl, sum hava verið grundarlagið undir avgerðini, til kærumyndugleikan.

Eru sjónarmið kærarans og avgerðarmyndugleikans viðvíkjandi faktum í málinum ósamsvarandi, skulu báðir partar í málinum hava høvi til at gera sínar viðmerkingar til tað, sum ført verður fram av hinum partinum.

Læknaváttanir, ummæli frá sakkønum, t.d. Hjálpitólamiðstøð, Andveikravernd, barnavernd, Húsalánsgrunni o.ø. skulu eisini fáast til vega.

**Stk. 3:** Tann myndugleikin, sum hevur tikið ta innkærdu avgerðina, hevur skyldu til at lata skrivstovu kærunevndarinnar allar tær upplýsingar, sum hava verið grundarlagið undir avgerðini. T.v.s. eisini øll skjøl, so sum ummælir, læknaváttanir o.a., sum hava verið brúkt til viðgerð av málinum.

**Stk. 4:** Landsstýrið ásetir nærri reglur um starvsgongdina á skrivstovu kærunevndarinnar.

**Ad § 8.**

**Stk. 1:** Burturvísing av einum máli kemur upp á tal, tá talan er um formligar manglar við kæruni, t.d. at kæran er ov seint innlatin, at kært verður um eitt mál, ið kærunevndin ikki hevur heimild at viðgera, t.d. skattamál, at málið ikki verður kært av rætta viðkomandi o.s.fr. Burturvísing hevur við sær, at málið als ikki verður viðgjørt.

Staðfesting av eini avgerð merkir, at kærumyndugleikin tekur undir við teimum sjónarmiðum og grundum, sum avgerðarmyndugleikin hevur tikið sína avgerð út frá.

Avtøka merkir, at avgerðin verður strikað. Kærunevndin kann avtaka eina avgerð, uttan at ein onnur avgerð verður sett í staðin. Ein avtøka av avgerðini kann viðføra, at nýggj avgerð ikki kann takast. Kærunevndin kann eisini avtaka avgerðina og samstundis afturvísa málið til nýggja viðgerð, møguliga við eini ábending um, hvørjar rættningslinjur eiga at verða fylgdar við nýggju viðgerðini av málinum. Gevur kærunevndin slíka ábending, er upprunamyndugleikin pliktaður at fylgja hesum. Innkærda avgerðin kann vera heilt ella lutvíst broytt.

**Stk. 2:** Hetta merkir, at kærunevndin ikki er bundin til at taka avgerð einans samsvarandi málskravi partanna. Ein avgerð kann broytast út yvir tað, sum partarnir hava framført.

**Stk. 3:** Heimild er hjá kærunevndini at geva skrivstovu kærunevndarinnar fulltrú til at avgreiða ávís mál.

Fulltrú kann gevast skrivstovuni til einsamøll at avgreiða málið, ella treytað av, at avgerð verður tikin saman við formanninum í kærunevndini. Hugsað verður fyrst og fremst um, at tað kann vera skilagott, at skrivstovan sjálvstøðugt kann fáa heimild at avgreiða púra ivaleys mál innan eitt øki, sum kærunevndin fleiri ferðir hevur staðfest eina fasta siðvenju.

Annars er eisini heimild hjá kærunevndini at geva fulltrú til at taka avgerð í serliga átroðkandi málum, har tað annars má roknast við, at bíðast ikki kann eftir viðgerð í kærunevndini.

**Stk. 4:** Allar avgerðir, sum verða tiknar sambært fulltrú, annaðhvørt av skrivstovuni ella av skrivstovuni saman við formanninum, skulu skjótast gjørligt leggjast fyri kærunevndina til kunningar. Hetta gevur kærunevndini møguleika til at fylgja við teimum tiknu avgerðunum, og at boða frá og geva nýggjar rætningslinjur, um kærunevndin t.d. ikki tekur undir við eini avgerð, sum tikin er sambært fulltrú. Hetta fær tó onga ávirkan á tær avgerðir, ið tiknar eru til fyrimuns fyri kæraran, men kærunevndin kann altíð broyta eina noktandi avgerð, sum er tikin sambært fulltrú. Tá so er, skal skrivstovan framyvir ansa eftir, at avgerðirnar verða tiknar í tráð við nýggju rætningslinjurnar frá kærunevndini.

**Ad § 9.**

**Stk. 1:** Tá avgerð er tikin, skal kærarin hava skrivliga fráboðan um hetta. Eisini skal í skrivinum verða upplýst, hvørji sjónarmið og grundir hava verið avgerandi fyri avgerðina.

**Stk. 2:** Landsstýrið skal áseta nærri reglur um í hvørjum líki, almannakunngerð av avgerðunum hjá kærunevndini skal gerast. Avgerðirnar skulu fyrst og fremst verða almannakunngjørdar uttan navn og bústað hjá kæraranum. Eisini skal tryggjast, at tað ikki er møguligt at sanna, hvønn ið avgerðin viðvíkur, tá hesar verða almannakunngjørdar.

Ætlanin við almannakunngerð er einamest upplýsing, soleiðis at tað skal vera møguligt hjá øðrum enn kærunevndini at síggja, hvussu nógvar, á hvørjum økjum og við hvørjum úrsliti, kærur eru avgreiddar. Hetta kann verða hent tilfar hjá bæði viðgerðarmyndugleikunum í samband við viðgerð av umsóknum og hjá landsstýrinum í samband við gerð av kunngerðum og leiðbeinandi reglum. Eisini borgarin hevur tá betri møguleikar at kunna seg um, hvat má roknast at vera galdandi rættur innan hetta økið í Føroyum.

**Ad § 10.**

**Stk. 1:** Tagnarskyldan umfatar bæði nevndarlimir, varalimir, skrivstovustarvsfólk, serkøn og onnur, sum orsakað av einum tilknýti til kærunevndina fáa kunnleika um privat viðurskifti hjá kærufólki. Tagnarskyldan umfatar somuleiðis

áhugafeløg, fakfeløg o.l. felagsskapir, sum á fundi við kærunevndina møguliga fáa kunnleika um privat viðurskifti hjá kærufólki.

**Ad § 11.**

**Stk. 1:** Lógin er ætlað at koma í gildi 1. januar 1993, og tá skal kærunevndin vera vald og starvsfólk sett á skrivstovu kærunevndarinnar.

**Stk. 2:** Tað kann hugsast, at skrivstova kærunevndarinnar ikki kann verða mannað fyrrenn til 1. februar ella 1. mars 1993. Um so er, kann almanna- og heilsudeildin á Landsskrivstovuni vegna skrivstovu kærunevndarinnar í eitt stutt tíðarbil móttaka kærumar og senda tær til ummælis. Sjálv viðgerðin og avgerðin skal tó takast av kærunevndini, tá kæran er innkomin eftir 1. januar 1993.

**Stk. 3:** Kærur, sum eru innkomnar til og við 31. desember 1992 verða avgreiddar av almanna- og heilsudeildini sum higartil.

**Stk. 4:** Sum móttøkudagur verður roknaður tann dagur, tá skrivið er innjournaliserað og sostatt stemplað sum móttikið.

## Álit

í

*løgtingsmáli nr. 56/1992: Løgtingslóg um kærunevnd í almannamálum.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 11. desember 1992 og eftir 1. viðgerð 15. januar 1993 beint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur havt fund við Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann í almannamálum, Tommy Petersen almannastjóra, og Nellu Festirstein, landsstýrisfulltrúa.

Eisini hevur almanna- og heilsunevndin havt fund við hesi umboð fyri pensjónistafelagið: Albin Wang, Schønning Eysturoy og Johan Hansen.

Fundur hevur eisini verið við formannin í Vanlukkutryggingarráðnum, Jógvan Andreasen, sorinskrivara.

Fundarumfarið endaði við fundi við MBF, umboðað av Margretu Næs, Karin Margretu Joensen-Næs og Øssuri av Steinum.

Almanna- og heilsunevndin hevur hesar viðmerkingar til málið:

Flestu samfeløg eru uppbygd við einum lóggevandi valdi, einum útinnandi og einum dømandi valdi. Soleiðis er eisini í Føroyum. Innan almannalóggávuna hava vit tó eitt undantak. Føroya Løgting er lóggevandi, meðan landsstýrið er bæði útinnandi og kærumyndugleiki í almannamálum. Við uppskoti landsstýrisins um kærunevnd í almannamálum er skilt sundur.

Við hesum lógaruppskoti eru ikki øll øki innan almannaverkið undir kærunevndini, tí til tað krevjast broytingar í ríkislógum. Broytingar til fólkatingslógir verða vanliga savnaðar saman. Tá kærunevndin er farin at virka, er ætlanin so við og við at fáa øll øki undir kærunevndina.

Frá landsstýrinum varð upplýst, at umleið 200 kærur koma árliga, og at tað tíverri ofta tekur langa tíð at avgreiða kærumar. Avgreiðslutíðin er oftast omanfyri tveir mánaðir. Mannagongin hevur verið, at við móttøku av eini kæru verður hon send Almannastovuni til ummælis. Tá landsstýrið hevur fingið ummælið, verður avgerð tikin, og kæran avgreidd so skjótt, sum arbeiðsorka hevur verið til tað, men nevndin er samd um, at samlaða tíðin hevur verið alt ov long.

Almannastjórin upplýsti fyri nevndini, at fólk nú er sett til serliga at taka sær av at ummæla kærur á Almannastovuni, og at hetta tí nú verður munin skjótari. Kærunevndin fær umstøður at avgreiða kæruna skjótt. Løgtingið hevur áður samtykt, at almennir stovnar skulu svara brøvum og skrivum frá borgarum innan 3 vikur.

Nógvar atfinningar hava eisini verið um, at Almannastovan nýtir alt ov langa tíð til at avgreiða umsókn frá borgarunum. Almannastjórin upplýsti fyri nevndini, at í løtuni fer fram ein umskipan av Almannastovuni, sum ætlandi kemur at stytta munandi um avgreiðslutíðina.

Sosiala deildin hjá Tórshavnar kommunu hevur í samband við fyriliggjandi uppskot til løgtingslóg um kærunevnd í almannamálum í skrivi tann 30. september 1992 viðmerkt m.a., at eftir uppskotinum skulu avgerðir tiknar av kommunalari sosialari deild, kunna kærast til Almannastovuna.

Tá ný serkøn kærunevnd verður sett, verður tað ikki hildið at vera rætt, at Almannastovan skal verða kærustovnur, tá talan er um kommunalar sosialar deildir.

Av tí at avgerðir hjá Almannastovuni sum kærumyndugleiki sambært uppskotinum kunnu kærast til kærunevndina í almannamálum, vil hetta einans føra við sær, at avgreiðslutíðin verður óneyðuga long. Eisini skal havast í huga, at útdeildirnar hjá Almannastovuni og sosiala deild hjá býráðnum hava somu vegleiðandi reglur at ganga eftir, sum høvuðsdeildin á Almannastovuni.

Eftir § 1, stk. 4 kunnu avgerðir í málum, sum Almannastovan hevur tikið, annaðhvørt sum viðgerðarmyndugleiki ella sum kærumyndugleiki, sambært stk. 3 og avgerðir hjá útdeildum hjá Almannastovuni innan 4 vikur kærast til kærunevndina í almannamálum. Tá almanna- og heilsunevndin er vitandi um, at Tórshavnar býráð skrivliga hevur vent sær til landsstýrið um hesar spurningar, væntar nevndin, at landsstýrið syrgir fyri at fremja neyðugar broytingar í fólkatingslógunum soleiðis, at hesi viðurskifti eru lóggivin best møguligt.

Nógv hevur undir viðgerðini verið tosað um samansetingina av kærunevndini. Spurningurin er, um nevndin bert skal vera samansett av serkønum, ella um brúkarar eisini skulu hava umboð. Brúkarabólkarnir eru nógvir, og er hetta tí trup-

ult. Sbrt. § 4 eigur kærunevndin eftir áheitan ella kann av sínum eintingum geva nøkrum høvi til at siga fram sína áskoðan fyri kærunevndini. Mett verður, at tað er betra loysnin. Ein møguleiki, ið er nevndur, er tann, at løgtingið velur tvey umboð.

Nevndin er samd um, at kærunevndin verður samansett sum uppskot landsstýrisins fyrisetur, við trimum umboðum, men at lógin verður endurskoðað innan trý ár, m.a. við hesum spurningi fyri eyga, og verður broytingaruppskot hesum viðvíkjandi sett fram.

Eftir § 11 skal lógin fáa gildi tann 1. januar 1993, men hetta verður neyðugt at broyta til, at lógin fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, so at nevndin byrjar við sløttum borði. Somuleiðis, at í nevndu grein, stk. 2 verður samsvarandi broyting gjørd viðvíkjandi kærum sambært § 1.

§ 10 í lógini nevnir tagnarskyldu, sum er neyðug. Í Danmark útgevur tílíkur kærumyndugleiki hvørt ár eina ársfrágreiðing, har allar kærur eru nevndar, tó uttan nøvn. Skjøl, frágreiðingar og avgerðir eru kunngjørd, so fyri tann, ið vil, er møguleiki at vita, hvørjar rætningslinjur kærunevndin hevur, og hvørja avgerð nevndin tekur í ávísum slagi av málum. Tílík skipan hevur tænt øllum, og er almanna- og heilsunevndin av teirri áskoðan, at hetta átti eisini at verið fyri føroysku kærunevndina.

Við omanfyrinevndu viðmerkingum mælir ein samd nevnd til at samtykkja uppskot landsstýrisins og setir fram soljóðandi:

**broytingaruppskot**

1) Í § 11 verður sett sum nýtt stk. 1: "Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og verður lógin at endurskoða um 3 ár."
2) Í § 11, stk. 2 verður "1. januar 1993" broytt til: "dagin eftir, at lógin er kunngjørd".
3) Í § 11, stk. 3 verður "31. desember 1992" broytt til: "dagin fyri, at lógin verður kunngjørd".

1) I § 11 indsættes som nyt stk. 1: "Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse, og skal loven revideres om 3 år."
2) I § 11, stk. 2 ændres "1. januar 1993" til: "dagen efter lovens bekendtgørelse".
3) I § 11, stk. 3 ændres "31. desember 1992" til: "dagen før lovens bekendtgørelse".

**Uppískoytisálit**

**til**

*løgtingsmál nr. 56/1992: Løgtingslóg um kærunevnd í almannamálum.*

**Broytingaruppskot**

**til**

**uppskot landsstýrisins**

§ 2, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"Í kærunevndini sita 5 limir, sum landsstýrið velur. Ein limur skal vera lækni, ein løgfrøðingur, ein sosialráðgevi, ein valdur eftir tilmæli frá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum og ein valdur eftir tilmæli frá Meginfelag Teirra Brekaðu. Landsstýrið tilnevnir formannin. Fyri hvønn nevndarlim verður valdur ein varalimur. Starvstíðin hjá nevndarlimum og varalimum er 4 ár."

§ 2, stk. 1 affattes således:

"Ankenævnet består af 5 medlemmer, der vælges af landsstyret. Et medlem skal være læge, en jurist, en socialrådgiver, en valgt efter indstilling af parterne på arbejdsmarkedet og en efter indstilling fra Meginfelag Teirra Brekaðu. Landsstyret udnævner formanden. For hvert medlem vælges en suppleant. Medlemmer og suppleanter vælges for fire år ad gangen."

**Viðmerkingar:**

Tá løgtingið samtykkir at seta á stovn kærunevnd í almannamálum, er tað til tess at tryggja, at borgarin og brúkarin av almannaverkinum fær rætta, rímiliga og javnbjóðis viðgerð. Eisini er endamálið at tryggja alment innlit í málsviðgerð, fyrisiting og skipan av almannaverkinum. Skal hetta endamál røkkast, er tað neyðugt, at brúkarin fær neyðugt innlit, ávirkan og ábyrgd. Arbeiðsmegin og tey brekaðu eru tey, ið oftast koma í samskifti við almannaverið, tað er tí rímiligt, at hesir partar fáa umboð í kærunevndina. Ein tílík skipan kann eisini vera við til at tryggja fjøltáttað afturljóð, ið kann slóða fyri skilagóðum ábótum á almannaverkið.

Tí setir Sjálvstýrisflokkurin hetta broytingaruppskotið fram.

# 57. Uppskot til "Lov om ændring af forskellige love for Færøerne om sociale ydelser"

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið mælir ríkismyndugleikunum til at uppskot til:

1) "Lov om ændring af forskellige love for Færøerne om sociale ydelser. (Indtægtsregulering af folkepensionens grundbeløb for de 67-70 årige, nedsættelse af barselsperioden og forlængelse af dagpengeperioden ved sygdom til 20 uger m.v.)", verður sett í gildi í Føroyum.

**Viðmerkingar.**

Hjálagt er lagt uppskot tilevnað í samráð við Almannamálaráðið viðvíkjandi broyting í fólkapensiónslógini, dagpeningalógini og forsorgarlógini.

Broytingin í fólkapensiónslógini hevur við sær, at grundarupphæddin í fólkapensiónini fyri persónar 67 - 70 ár ikki longur verður óheft av fíggjarligu viðurskiftunum hjá viðkomandi, men verður framyvir tengd at arbeiðsinntøkuni hjá pensionistinum, men ikki aðrari inntøku, so sum rentuinntøka, onnur kapitalinntøka, eftirløn, pensión o.l.

Sparingin í 1993 við hesi broytingini er fyri landskassan mett til 10,4 mió. kr., og fyri statin 2,4 mió. kr.

Metta sparingin hjá landskassanum upp á 10,4 mió. kr. er 0,6 mió. kr. hægri enn tann upphæddin, sum roknað varð við viðvíkjandi sparing av fólkapensiónsútreiðslum á uppskoti landsstýrisins til fíggjarløgtingslóg fyri 1993. Játtanin á § 19, rakstrarstað 19056: "Fólkapensjón", eigur at verða lækkað frá 226,7 mió. kr. til 226,1 mió. kr.

At sparingin hjá statinum er so nógv minni enn hjá landskassanum kemur av, at broytingarnar í fólkapensiónslógini partvís eru fíggjaðar við at minka um framfhjáupphæddina, sum landskassin sambært § 34 í fólkapensiónslógini eigur at rinda. Hetta merkir eisini, at afturgjaldið frá ríkiskassanum viðvíkjandi fólkapensiónsútreiðslunum als ikki minkar so nógv, sum roknað varð við frammanundan. Avleiðingin av hesum er, at á uppskoti landsstýrisins til fíggjarløgtingslóg

fyri 1993 eiga á § 8, rakstrarstað 8005: "Afturgjald" at verða lagdar 9 mió. kr. afturat, til samanlagt 244 mió. kr.

Broytingin í dagpeningalógini er lækkan av dagpeningatíðarskeiðnum í samband við barnsburð frá 24 til 20 vikur. Eisini er skotið upp, at leingja dagpeningatíðarskeiðið vegna sjúku úr 13 til 20 vikur.

Av tí at ætlanin er, at lækkanin av dagpeningatíðarskeiðnum í samband við barnsburð frá 24 til 20 vikur ikki skal fáa gildi fyrrenn væntandi til 1. juni 1993, verða meirútreiðslurnar í 1993 nakað hægri enn komandi árini.

Meirútreiðslan í 1993 við hesum broytingunum í dagpeningalógini er fyri landskassan mett at verða umleið kr. 3,3 mió. og fyri statskassan umleið kr. 1,1 mió. Annars verður árliga meirútreiðslan av broytingunum fyri landskassan mett til 1,8 mió. kr. og fyri statin 0,6 mió. kr.

Samstundis verður lagt fram uppskot um at avtaka løgtingslógina um dagpening í samband við sjúku og barnsburð. Sambært hesi løgtingslógini hava persónar higartil kunna fingið framhaldandi dagpening í 13 vikur, soleiðis at samlaða dagpeningatíðarskeiðið vegna sjúku ialt var 26 vikur.

Sparingin við avtøku av hesi løgtingslógini er fyri 1993 mett at verða umleið 5 mió. kr. Ein partur av hesari sparingini (3,3 mió. kr.í 1993 og komandi árini 1,8 mió. kr.) verður brúkt til at fíggja frammanfyrinevndu broytingarnar í donsku dagpeningalógini. Sostatt verður mett, at samlaðu sparingarnar innan dagpengaøkið fyri 1993 verða kr. 1,7 mió. kr., men komandi árini 3,2 mió. kr. árliga.

Metta sparingin uppá 1,7 mió. kr. í 1993 er 1,3 mió. kr. lægri enn tann upphæddin, sum roknað var við á uppskoti landsstýrisins til fíggjarløgtingslóg fyri 1993.

Sostatt eigur játtanin á § 19, rakstrarstað 19659: "Dagpeningaskipanin" at verða hækkað frá 41,5 til 42,8 mió. kr.

Broytingin í forsorgarlógini gevur heimild til, at landsstýrið kann geva teimum, ið fáa fyribilshjálp, eitt arbeiðstilboð saman við almannahjálpini. Eisini verður ein gloymd avleiðingarbroyting í samband við lækking av fyribilshjálpini vegna arbeiðsloysi gjørd. Herumframt verða gjørdar nakrar smærri broytingar fyri meira greiniliga enn nú at lýsa lógartekstin.

Meirútreiðslurnar av hesum broytingunum eru fyri landskassan mettar at verða 1,2 mió. kr. í 1993. Størsti parturin av hesi meirútreiðsluni er ein avleiðing av, at løgtingslógin um dagpening í samband við barnsburð og sjúku verður avtikin. Hetta vegna tess, at persónar, sum hava fingið sjúkradagpengar í 20 vikur, men framvegis ikki eru arbeiðsførir, kunnu hava rætt til framhaldandi stuðul eftir § 9 í forsorgarlógini.

Hesar meirútreiðslurnar eru ikki tiknar við á uppskoti landstýrisins til fíggjarløgtingslóg fyri 1993. Tess vegna eigur játtanin á § 19, rakstrarstað 19403: "Vanlig forsorg" at verða hækkað frá 66,0 til 67,2 mió. kr.

Hóast dagpeninga- og forsorgarjáttanin á fíggjarlógaruppskotinum fyri 1993 verða hækkaðar, so viðføra framløgdu broytingarnar eina meirsparing upp á 7,1 mió. kr. í mun til framlagda uppskot landsstýrisins til fíggjarlóg fyri 1993.

Víðvíkjandi nærri upplýsingum um broytingarnar verður víst til viðmerkingarnar í lóganuppskotinum.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 57/1992: Uppskot til "Lov om ændring af forskellige love for Færøerne om sociale ydelser".*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 11. desember 1992 og eftir 1. viðgerð 14. desember 1992 beint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur havt fund við Tommy Petersen, almannastjóra, og Heðin Veihe, fulltrúa á Almannastovuni.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirlutin (Jørgen Niclasen, Sommer Winther og Eyðálvur Dimon) førir fram:

**Fólkapensjónslógin:**

Broytingin í fólkapensjónslógini hevur við sær, at grunduppheddin í fólkapensjónini fyri persónar 67-70 ár verður ávirkað av arbeiðsinntøku pensjónistanna. Fyri ein stakan ávirkar hetta soleiðis, at um inntøkan er niðanfyri kr. 23.300, verður grunduppheddin óbroytt.

Har frá og upp eftir verður grundarupphæddin inntøkujavnað, inntil arbeiðsinntøkan fer upp um kr. 87.600 tá fellur grunduppheddin burtur.

Hjún verða roknað hvørt fyri seg, óávirkað av hvørjum øðrum. Grunduppheddin byrjar at minka, tá inntøka hjá tí eina fer upp um kr. 23.300, og fellur burtur, tá upphæddin fer upp um kr. 74.400.

**Dagpeningalógin:**

Broytingin fyri dagpening verður sambært løgtingslóg nr. 58 og 57 tann, at dagpeningatíðin í samband við barnsburð, fer frá 24 vikum niður í 20 vikur. Dagpeningatíðin vegna sjúku fer frá 26 vikum niður í 20 vikur, og um umstøðurnar gera tað neyðugt, kann tann sjúki fáa stuðul eftir forsorgarlógini eftir tjúgundu viku.

**Forsorgarlógin:**

Nevndi meiriluti vísir á uppskot til samtyktar frá almanna- og heilsunevndini, dagfest 2. apríl 1992, samtykt tann 9. apríl 1992 við 19-0, har álagt varð lands-

stýrinum at kanna, hvørjir møguleikar eru at gera líknandi skipan fyri Føroyar sum í Frederikshavns kommunu.

Síðani tá hevur landsstýrismaðurin í almannamálum og formaðurin í almanna- og heilsunevndini verið í Frederikshavn saman við umboðum fyri umsitingina og kannað umstøðurnar har. Skipanin í Frederikshavn var áhugaverd og varð avrátt at arbeiða fram ímóti at laga forsorgarlógina soleiðis, at fólk, ið koma undir forsorgarlógina, kunnu koma til at arbeiða fyri peningin.

Við fyriliggjandi uppskotnu broytingunum verður latið upp fyri hesum møguleika, so byrjast kann longu næsta ár við fyrstu arbeiðstilboðunum. Hetta verður fyrst boðið teimum ungu, ið ongantíð hava fingið nakað arbeiðstilboð, og síðani verður arbeitt fram ímóti, at lógin kann verða fyri øll tey arbeiðsføru, ið eru undir forsorgarlógini.

Við hesum mælir nevndi meiriluti (Jørgen Niclasen, Sommer Winther og Eyðálvur Dimon) til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein minniluti (Lisbeth L. Petersen og Lasse Klein) vísir á, at í hesum uppskoti til samtyktar eru broytingar í fólkapensjónslógini, dagpeningslógini og forsorgarlógini. Minnilutin kann taka undir við broytingunum í forsorgarlógini og møguliga dagpeningslógini, men av tí at øll hesi uppskot eru tengd saman í einum uppskoti til samtyktar, kann minnilutin ikki taka undir við uppskotinum.

# 58. Avtøka av løgtingslóg um dagpening í samband við barnsburð og sjúku

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg um dagpening í samband við barnsburð og sjúku.*

**§ 1.**

Løgtingslóg nr. 25 frá 30. apríl 1987 um dagpening í samband við barnsburð og sjúku við seinni broytingum verður sett úr gildi.

*lagtingslov om ophævelse af lagtingslov om dagpenge ved barsel og sygdom.*

**§ 1.**

Lagtingslov nr. 25 af 30. april 1987 om dagpenge ved barsel og fødsel med senere ændringer ophæves.

| | |
|---|---|
| **§ 2.** | **§ 2.** |
| Hendan lóg fær gildi 1. januar 1993. | Denne lov træder i kraft 1. januar 1993. |

**Viðmerkingar:**

Í uppskoti landsstýrisins til fíggjarlóg fyri 1993 eru gjørdar fleiri skerjingar. Fyritreytin fyri nøkrum av hesum skerjingunum er, at lógarbroytingar verða gjørdar viðvíkjandi lógarásettum veitingum. Hetta er m.a. galdandi fyri dagpeningaøkið.

Við avtøku av hesi lógini fellur rætturin hjá kvinnum til eykadagpening í samband við barnsburð burtur.

Hendan rætt hava tær kvinnur havt, sum í samband við fráveru frá arbeiðinum vegna barnsburð hava havt rætt til eina dagpeningaupphædd eftir "Lov for Færøerne om dagpenge ved sygdom og fødsel", sum er minni enn helvtin av dagpeningamaksimum. Hesar kvinnur hava eftir hesi løgtingslógini tá havt rætt til eykadagpening, sum er munurin millum dagpeningin hjá kvinnuni eftir "Lov for Færøerne om dagpenge ved sygdom og fødsel" og 50 % av dagpeningamaksimum.

Við avtøku av hesi lógini fellur eisini rætturin til eykadagpening vegna sjúku burtur. Higartil hevur verið møguligt at kunna fáa dagpening vegna sjúku í upp til 26 vikur; fyrstu 13 vikurnar sambært "Lov for Færøerne om dagpenge ved sygdom eller fødsel" og síðani framhaldandi eftir løgtingslógini um dagpening í samband við barnsburð og sjúku.

Hetta førir við sær, at dagpeningur vegna sjúku framyvir kann veitast í mesta lagi í 13 vikur. Landsstýrið hevur tó ætlanir um at fáa framt lógarbroytingar í "Lov for Færøerne om dagpenge ved sygdom og fødsel" soleiðis, at dagpengaskeiðið vegna sjúku verður longt frá 13 til 20 vikur. Hetta ynski landsstýrisins til lógarbroyting er lagt fyri Almannamálaráðið.

Við tað, at tað her er talan um broyting av eini fólkatingslóg, er tað neyðugt, at Almannamálaráðið í Danmark í samráð við landsstýrið fyrst ger eitt uppskot til lógarbroyting. Hetta uppskotið skal samtykkjast av Løgtinginum og síðani eisini av Fólkatinginum, áðrenn lógarbroytingin kann fáa gildi. Um skjótt verður atborið, kann lógarbroytingin fáa gildi 1. januar ella 1. februar 1993.

Sparingarnar við avtøku av hesi løgtingslógini eru mettar til umleið kr. 5 mió. í 1993.

**Álit**

**í**

*løgtingsmáli nr. 58/1992: Avtøka av løgtingslóg um dagpening í samband við barnsburð og sjúku.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 11. desember 1992 og eftir 1. viðgerð 14. desember 1992 beint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Ein meiriluti (Jørgen Niclasen, Sommer Winther og Eyðálvur Dimon) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins, og vísir á viðmerkingar meirilutans í álitinum í løgtingsmáli nr. 57: Uppskot til "Lov om ændring af forskellige love for Færøerne om sociale ydelser".

Ein minniluti (Lisbeth L. Petersen) setir einki uppskot fram.

Ein annar minniluti (Lasse Klein) setir einki uppskot fram.

# 59. Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald.*

Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 við seinni broytingum um meirvirðisgjald verða gjørdar hesar broytingar:

**§ 1.**

§ 2, stk. 3, litra e verður orðað solciðis:

"ítróttur og ítróttartiltøk."

**2. stk.** Sum nýtt § 3, stk. 1, litra f verður sett: "Søla av rúsandi løgi og søla av medisini, sjálvt um søla av tí-

*lagtingslov om ændring i lagtingslov om meromsætningsafgift.*

I lagtingslov nr. 136 af 8. september 1992 med senere ændringer om meromsætningsafgift foretages disse ændringer:

**§ 1.**

§ 2, stk. 3, litra e affattes således: "sportsaktiviteter og sportsarrangementer."

**Stk. 2.** Som nyt § 3, stk. 1 litra f indsættes: "Salg af berusende drikke og salg af medicin, uanset om salg af så-

líkum vørum ikki verður framd í kapping við privat virki."

§ 2.

Henda lóg fær gildi 1. januar 1993.

danne varer ikke foretages i konkurrance med private virksomheder."

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1993.

**Viðmerkingar:**

Uppskot landsstýrisins er at fremja eina broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald og at fáa sligið fast, at almenn monopol, ið selja vørur og tænastur, eisini eru avgjaldsskyldug sambært løgtingslóg um meirvirðisgjald.

**Viðmerkingar til tær einstøku greinarnar:**

**Til § 1, pkt. 1**

Í § 2, stk. 3, litra e í løgtingslóg um meirvirðisgjald er ásett, at ítróttartiltøk, sum professionellir luttakarar luttaka í, eru avgjaldsskyldug, fótbóltsdystir tó bert, tá professionellir luttakarar eru á báðum liðum.

Uppskot landsstýrisins er, at allur ítróttur verður undantikin meirvirðisgjaldi. Eisini tiltøk har ið professionellir luttaka.

Við hesari broyting verður allur ítróttur líkastillaður, hvat meirvirðisgjaldi viðvíkur.

**Til § 1, pkt. 2**

Í § 3, stk. 1, litra d í løgtingslóg um meirvirðisgjald er ásett, at almennir stovnar, ið ikki eru almenn veitingarvirki sambært § 3, stk. 1, litra c, bert eru meirvirðisgjaldsskyldugir, um teir selja vørur og avgjaldsskyldugar tænastur í kapping við vinnurekandi virki.

Í ávísum førum, t.d. tá ið talan er um almenn monopol, sum t.d. Rúsdrekkasøla Landsins og Tjaldurs Apotek, kann tað verða ivasamt, nær ið talan er um alment veitingarvirki.

|---|---|---|---|---|---|
| 363819 | Bústovnar fyri sinnis-brekað | | | | |
| | Institutioner for sindsl. | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 363827 | Hjálpargr.móti alkoh.-misnýtslu | | | | |
| | Hjælpefond mod alko-holmisbrug | 1200 | 700 | 0 | 700 |
| 363851 | Landsfelag pensio-nistanna | | | | |
| | Pensionist. landsf. | 200 | 200 | 0 | 200 |
| 333104 | Trygdargr. f. avreið. og lønir | | | | |
| | Lønmodt. garantifond | 650 | 650 | 0 | 650 |
| 373305 | Landsst. at ráða yvir | | | | |
| | Landsst. at råde over | 200 | 200 | 838 x) | 1038 |
| | **Rakstur** | **758349** | **779755** | **752** | **780507** |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | Vardar íbúðir, í Tórsh. | | | |
| | Beskyttede pensionistb., Torsh. | | | 0 |
| | Bústovnar, serforsorg | | | |
| | Døgninstit., særfors. | 3000 | 407 | 0 | 407 |
| | Dagheim á Berjabrekku. nýb. | | | | |
| | Daginst., Berjabrekka | 4500 | 4500 | 0 | 4500 |
| | Uml.heim og búst., Suðuroy | | | | |
| | Døgninst., Suðuroy | 1500 | 0 | 0 | 0 |
| | Búst., Eysturoy, nýb. | | | | |
| | Døgninstit. Eystur., nyb. | 0 | 0 | 0 | 0 |
| | Eysturoyar Røktarh. Eysturoy | | | | |
| | Plejehjem | | | | 0 |
| | Røktarheim Norðstreymoy,nýb. | | | | |
| | Plejehj., Norðstr., nyb. | 1000 | 0 | 0 | 0 |
| | Ellish. í Havn, umb. | | | | |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Alderdomshjem, Tórshavn, omb. Sandoyar Ellis- og røktarh. | 0 | 0 | 0 | 0 |
| | Sandoy Alderd. og plejehjem | 7800 | 6000 | 0 | 6000 |
| | **Íløgur** | **17800** | **10907** | **0** | **10907** |
| | | **776149** | **790662** | **752** | **791414** |

| | **Íbúðarmál** | **J 1992** | **Endursk. 1992** | **Eyka- játt. 92** | **Samlað játt. 92** |
|---|---|---|---|---|---|
| 19956 | Húsalánsgrunnurin Boliglånefondet | 10000 | 5000 | 0 | 5000 |
| 19961 | Íbúðargrunnur Boligfond | 1000 | 1000 | 0 | 1000 |
| 19975 | Rentustudn. til húsa-bygging | | | | |
| | Rentetilskud t. husop-sparing | 1700 | 1700 | 0 | 1700 |
| | **Rakstur** | **12700** | **7700** | **0** | **7700** |

| **Grein 20** | **Eftirlønarútr. Pensionistudg.** | **J 1992** | **Endursk. 1992** | **Eyka- játt. 92** | | **Samlað játt. 92** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 20013 | Eftirlønarútr. Pensionsudgifter | | | | | |
| 103558 | Eftirlønir Pensioner | 840 | 840 | 0 | | 840 |
| 103599 | Danskar eftirlønir Danske pensioner | | | 200 | x) | 200 |
| 103612 | Bíðipeningur Ventepenge | 4400 | 4400 | 0 | | 4400 |
| 103629 | Tænastum.eftirl. Tjenestem. pensio. | 6900 | 6900 | 0 | | 6900 |
| | **Rakstur** | **12140** | **12140** | **200** | | **12340** |

| Grein 21 | **Effektivar veðhalds-bindingar**<br>**Effekt. Garantiforpl.** | **J 1992** | **Endursk. 1992** | **Eyka-játt. 92** | **Samlað játt. 92** |
|---|---|---|---|---|---|
| 21019 | Effektivar veðhalds-bindingar<br>Effekt. garantiforpl. | 80000 | 190000 | 36000 | 226000 |

| Grein 22 | **Rentuútreiðslur**<br>**Renteudgifter** | **J 1992** | **Endursk. 1992** | **Eyka-játt. 92** | **Samlað játt. 92** |
|---|---|---|---|---|---|
| | Rentuútreiðslur<br>Renteudgifter | 220000 | 220000 | 34000 | 254000 |
| | Rentur av bundnari uppsparing<br>Renter af bunden op-sparing | 3000 | 3000 | 0 | 3000 |
| | | **223000** | **223000** | **34000** | **257000** |

| Grein 26 | **Ymsar ognarútreiðslur**<br>**Diverse ejendomsudg.** | **J 1992** | **Endursk. 1992** | **Eyka-játt. 92** | **Samlað játt. 92** |
|---|---|---|---|---|---|
| 26305 | Ymsar ognarútreiðslur<br>Div. ejendomsudgifter | 700 | 700 | -500 | 200 |

| Grein 27 | **Óvissar útreiðslur**<br>**Uvisse udgifter** | **J 1992** | **Endursk. 1992** | **Eyka-játt. 92** | **Samlað játt. 92** |
|---|---|---|---|---|---|
| 27005 | Óvissar útreiðslur<br>Uvisse udgifter | 14000 | 0 | 0 | 0 |

| | **Rakstrarroknsk.**<br>**Driftsregnskab** | **Játtan 1992** | **Endursk. 1992** | **Eyka-játt. 92** | **Samlað játt. 92** |
|---|---|---|---|---|---|
| | Inntøkur tilsamans<br>Indtægter ialt | 2795255 | 2695755 | -149550 | 2546205 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | Rakstrarútr. (-rentu-útr. veðh. og upp-høgging) | | | | |
| | | Dr.udg.excl.gar.f.pl. og kond. | 2271099 | 2282445 | 59705 | 2342150 |
| | | Rentuútreiðslur | | | | |
| | | Renteudg. | 223000 | 223000 | 34000 | 257000 |
| | | Upphøgging og eff. veðhaldsútr. | | | | |
| | | Garantif.pl. og kon-demn. | 80000 | 190000 | 36000 | 226000 |
| | | Íløguútr. tils. | | | | |
| | | Invest. ialt | 290600 | 256559 | 367150 | 623709 |
| | | **Útr. tils./ Udg. ialt** | **2864699** | **2952004** | **496855** | **3448859** |
| | | **Úrsl. av rakstri og íløgum** | | | | |
| | | **Result. e. drift og invest.** | **-69444** | **-256249** | **-646405** | **-902654** |

| | | **Gjaldførisroknsk.** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | **Likviditetsbudg.** | | | | |
| | | **Nýútlán** | | **Endursk.** | **Eyka-** | **Samlað** |
| | | **Nyudlån** | **J 1992** | **1992** | **játt. 92** | **játt. 92** |
| | 333025 | St.lán t. fiski- og farmaskip | | | | |
| | | Tilsk.lån t. fiske-og fragtskibe | 5000 | 5000 | 0 | 5000 |
| | | Likvidit.lán,fiski- og farmask. | | | | |
| | | Likvidit. lån,fiske- og fragtsk. | | | | 0 |
| 14953 | 313152 | Gr. til útbúgving, nettoútlán | | | | |
| | | Uddannelsesfond, nettoudlån | 8000 | 8000 | 0 | 8000 |
| | | Lán til heilsum.st. | | | | |
| | | Lån til sundhedsc. | 3000 | 3000 | 0 | 3000 |
| | | **Nýútlán tils. / Nyudlån ialt** | **16000** | **16000** | **0** | **16000** |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Avdráttir av uttanl. láni | | | | |
| Afdrag på udenl. lån | 105500 | 105500 | 0 | 105500 |
| Afturgjald av bundnari uppsparing | | | | |
| Tilbagebet. af bunden opspar. | 95000 | 32000 | 0 | 32000 |
| Afturgj. av veksilskuld til Tjóðb. | | | | |
| Nedbet. af gæld t. Nationalb. | 100000 | 100000 | 0 | 100000 |
| Avdr. av før. lánum | | | | |
| Afdr. på indenl. lån | 28000 | 20000 | 64000 | 84000 |
| Nýútlán og avdráttir, gjaldførisfr.gongd | | | | |
| Nyudlån og afdrag, likv. træk | 328500 | 257500 | 64000 | 321500 |
| Inngjalding av avdráttum, gjaldføristilgongd | | | | |
| Indb. på lån, forøg. af likv. | 39000 | 39000 | 0 | 39000 |
| **Kapitalpostar tils.** | | | | |
| **Kapitalposter ialt** | **-305500** | **-234500** | **-64000** | **-298500** |

| | **Játtan 1992** | **1992 Endursk.** | **Eyka-játt. 92** | **Samlað játt. 92** |
|---|---|---|---|---|
| Broyting í gjaldføri, bruttolánitørvur | | | | |
| Ændr. i Likv., lånebehov | -416644 | -490749 | -710405 | -1201154 |

**Viðmerkingar til eykafíggjarlógina 1992**

Inntøkugrundarlagið er nógv minkað seinastu árini og soleiðis hevur eisini verið í 1992. Tað hevur verið ógvuliga ringt at mett um inntøkuna.

Í fíggjarlógini fyri 1992, sum upprunaliga varð samtykt, varð mett, at skattainntøkan fór at verða kr. 1.059.000.000.

Men longu tíðliga í ár sást, at hesi tøl ikki komu at halda. Tí var ein endurskoðað fíggjarlóg gjørd í vár, har inntøkurnar vóru mettar av nýggjum og útreiðslurnar lagaðar hareftir.

Í endurskoðaðu fíggjarlógini varð skatturin mettur til kr. 941.000.000. Men nú árið er um at verða liðugt, vísir tað seg, at skatturin verður umleið kr. 834.000.000 ella kr. 107.000.000 minni enn á endurskoðaðu fíggjarlógini.

Tað er eisini komin minni tollur inn í 1992 enn upprunaliga mett, sjálvt um minkingin ikki hevur verið so stór sum í skattinum.

Tollurin verður nú mettur at geva kr. 565.500.000 ella kr. 39.000.000 minni enn á endurskoðaðu fíggjarlógini.

Samlaðu inntøkurnar í 1992 verða nú mettar til kr. 2.546.205.000 ella kr. 149.550.000 minni enn á endurskoðaðu fíggjarlógini.

At útreiðslurnar í 1992 nú verða mettar at verða kr. 3.448.259.000 ella kr. 496.855.000 meira enn á endurskoðaðu fíggjarlógini hevur sínar serligu orsøkir.

Løgtingið hevur samtykt, at játta kr. 300.000.000 til Fíggjargrunnin frá 1992 og kr. 75.000.000 til at keypa partabrøv í Atlantic Airways.

Tað hevur í hesum tíðum verið torført at meta um sovorðnar útreiðslur sum rentuútreiðslur og effektivar veðhaldsbindingar.

Veðhaldsútleggini verða nú mett at blíva kr. 36.000.000 og rentuútreiðslurnar kr. 34.000.000 meira í 1992 enn á endurskoðaðu fíggjarlógini.

Av teimum írestandi kr. 51.855.000 á eykafíggjarlógini eru eisini eykajáttanir givnar í árinum av landsstýri og fíggjarnevnd løgtingsins. (Hesar eru merktar x) á eykafíggjarlógaruppskotinum.) Annars skal viðmerkjast, at eykafíggjarlógin er uppstillað á sama hátt sum fíggjarlógaruppskotið fyri 1993.

**Samandráttur av broytingunum er sostatt:**

| | | |
|---|---|---|
| Minninntøkur | | kr. 149.550.000 |
| Meirútreiðslur, netto | | kr. 51.855.000 |
| | | kr. 201.405.000 |
| Meira effektivar veðhaldsbindingar | kr. 36.000.000 | |
| Meira rentuútreiðslur | kr. 34.000.000 | |
| Til Fíggjargrunn frá 1992 | kr. 300.000.000 | |
| Til P/F Atlantic Airways | kr. 75.000.000 | kr. 445.000.000 |
| **Tilsamans** | | **kr. 646.405.000** |

Sum sæst, eru høvuðsbroytingarnar á eykafíggjarlógini manglandi inntøkur og serligir postar so sum rentur, veðhald v.m.

Umleið kr. 52.000.000 er meirnýtsla, harav nakað væl er játtað av fíggjarnevndini.

Teir flestu stovnarnir halda játtanirnar, tó ikki allir. Tiltøk verða at seta í verk mótvegis teimum, sum ikki gera tað. Møguliga skal meirnýtsla í 1992 mótroknast í játtanini fyri 1993. Í øllum førum verður serliga neyvt eftirlit við teimum stovnum, sum hava havt meirnýtslu. Í onkrum førum t.v.s. fyri sjálveigandi stovnar verður meirnýtslan løgd út av landskassanum og seinni uppkravd aftur.

**Grein 5.**

**§ 5. 5105 Rentuinntøkur.**
Sí viðmerkingar til 11257 Líkningarráðið.

**Grein 10.**

**§ 10. løgtingsmenn.**
Meirnýtslan upp á kr. 463.000,00 stavar serstakliga frá útreiðslum til samsýning og ferða- og dagpening.

**§ 10. løgtingsbygningur.**
Meirútreiðslan upp á kr. 250.000,00 stavar frá útreiðslum til leigu av maskinum. Løgingsskrivstovan vísir til eina fíggjarnevndarsamtykt frá 27. juli 1989, har fíggjarnevndin einmælt samtykkir í prinsippinum at seta í verk EDV-viðgerð til mettan kostnað fyri ..... kr. 750.000,00
Harav í 1990 ..... kr. 250.000,00
í 1991 ..... kr. 250.000,00
í 1992 ..... kr. 250.000,00

**§ 10. 11991 Norðurlandaráð.**
Avtala skal gerast millum landsstýrið og løgtingið um annað býti av játtanini til Norðurlandaráðið.

**Grein 11**

**§ 11. 11048 Kunngerðarsavn og -blað.**
Kunngerðarsavn og -blað hevur fingið eina eykajáttan í 1992 upp á kr. 50.000.00. Peningurin kr. 15.000,00 skal takast av 11901/253753 løgreglumál og kr. 35.000,00 av 11001/373305 landsstýrinum at ráða yvir.

**§ 11. Líkningarráð.**
Landsstýrið og fíggjarnevdin hava samtykt eina eykajáttan til Meirvirðisgjaldsskipanina upp á kr. 5.200.000,00.

Hesin peningur skal býtast soleiðis millum tey rakstrarstøð, sum skulu umsita skipanina.

| | | | |
|---|---|---|---|
| Føroya Gjaldstova | | | + kr. 362.000 |
| 11433 | Fyrireiking av nýggjari avgjaldsskipan | - kr. 1.500.000 | |
| 5267 | Rentuinntøkur | - kr. 2.000.000 | |
| 26305 | Ymsar ognarútreiðslur | - kr. 500.000 | |
| 11257 | Líkningarráðið | - kr. 700.000 | |
| 11257 | Lík.n.r. MVG-fyris. | | + kr. 2.100.000 |
| 11257 | Líkningarráðið | | + kr. 500.000 |
| 11428 | EDV-projekt(Líkningarráð Føroya) MVG | | + kr. 2.238.000 |
| **Tilsamans** | | | **kr. 5.200.000** |

Harav eru bert kr. 500.000,00 verulig eykajáttan til Líkningarráðið. Restin av teim 5,2 milliónunum er fingin til vega av øðrum konti.

**§ 11. 11359 Almannastova.**
Í samband við at ein deildarleiðari andaðist í ár, var neyðugt at fyribilsseta annað starvsfólk í hansara stað.

Eisini bleiv neyðugt at umskipa arbeiði á EDV-økinum og eisini at fáa hjálp upp á konsulentbasis frá einum EDV virki.

Almannastovan sigur seg ikki klára hesar útreiðslur innan fyri játtanina. Tí søkir Almannastovan um eykajáttan í 1992 upp á kr. 273.800,00.

**§ 11. 11428 EDV-projekt (Líkningarráð Føroya) MVG.**
Sí viðmerking 11257 Líkningarráðið.

**§ 11. 11433 Fyrireiking av nýggjari avgjaldsskipan.**
Sí viðmerking til 11257 Líkningarráðið.

**§ 11. 11452 Føroya Gjaldstova.**
Sí viðmerking til 11257 Líkningarráðið.

**§ 11. Heilsu- og heimasjúkrasystrafyrisiting.**
Sambært skrivi frá heilsu- og heimasjúkrasystraskipanini verða brúktar kr. 265.000,00 minni í 1992.

**§ 11. Endurgjald sýslur.**
Fyrr hevur endurgjald til sýslur verið játtað undir serstøkum rakstrarstaði. Hetta er av einari ella aðrari orsøk strikað á fíggjarlógini. Men tað eru framvegis útreiðslur til hetta endamál. Útreislurnar fyri 1990, 1991 og 1992 eru kr. 213.500,00.

Útreiðslurnar í Vestmanna eru falnar burtur 1. januar 1992. Og útreiðslan í Vági fellur burtur 1. januar 1993. Síðan er bert útreiðslan upp á kr. 500,00 á Sandi eftir.

**§ 11. 11808 Innheintingarútreiðslur.**
Innheintingarútreiðslurnar í 1992 verða umleið kr. 600.000,00, tað vil siga at meirnýtslan í 1992 verður kr. 228.000,00.

Útreiðslurnar á hesum rakstrarstaði fara til løn til almenna innkrevjaran og sakførarar, sum krevja inn fyri landskassan. Hvussu stórar hesar seinnu útreiðslurnar verða í einum ári, kann verða ringt at meta um.

**§ 11. 11898 Útskifting og matrikulstova,**
Meirnýtslan hjá matrikulstovuni verður í 1992 kr. 877.000,00.

**§ 11. 11901 Landsverkfrøðingsstova.**
Eftir samráðing við landsstýrið eru fluttar kr. 1.000.000,00 frá § 13 til hetta rakstrarstað. Samlaða játtanin til landsverkfrøðingsstovnin heldur í 1992.

**§ 11. 11901/253753 Dóms -og løgreglumál.**
Sí viðmerking 11048 Kunngerðarsavn og -blað.

**§ 11. 119011/373305 Landsstýrinum at ráða yvir.**
Sí viðmerking 11048 Kunngerðarsavn.

**Grein 12.**

**§ 12. 12026 Útreiðslur viðvíkjandi Ríkissjúkrahúsinum.**
Meirnýtslan upp á kr. 500.000,00 stendst av øktum sjúklingatali til Ríkissjúkrahúsið.

**§ 12. 12109 Landssjúkrahúsið.**
Nýtslan hjá landssjúkrahúsinum verður í 1992 kr. 13.413.000,00. Harav er eykajáttan upp á kr. 8.300.000,00.

Sjálvt um eykajáttan upp á 8,3 mill.kr. er givin til landssjúkrahúsið, heldur játtanin ikki. Sparitiltøkini, ið sett hava verið í verk, boðar Sjúkrahúsverkið frá, hava ikki í fullan mun sligið í gjøgnum.

**§ 12. 12202 Klaksvíkar Sjúkrahús.**
Meirnýtslan hjá Klaksvíkar sjúkrahúsi verður í 1992 kr. 989.000,00.

Landsstýrið hevur í samband við góðkenning av roknskapi fyri 1991 fyri Klaksvíkar sjúkrahús samtykt, at boða sjúkrahúsinum frá, at meirnýtsla ikki eigur at endurtaka seg í 1992.

**§ 12. 12304 Suðuroyar Sjúkrahús.**
Meirnýtslan hjá Suðuroyar sjúkrahúsi í 1992 upp á kr. 1.130.000,00 stavar frá røntgentóli, ið keypt var í 1989. Bókingin hevur framhaldandi verið flutt ár undan ári. Upphæddin er nú bókað í inniverandi ári.

**§ 12. 12653 Heilsu- og heimasjúkrasystraskipanin.**
Meirnýtslan hjá heilsu- og heimasjúkrasystraskipanini verður í 1992 kr. 1.723.000,00.

Hóast spart hevur verið á tænastustøði í ymsum økjum, hevur tað ikki cydnast skipanini at halda játtanina.

Stovnurin verður lagdur saman við Heimahjálparaskipanini í 1993.

**Grein 13.**

**§ 13. 13265 Strandfaraskip Landsins.**
Í nógv ár hevur ógvuliga lítið samsvar verið millum játtan og nýtslu hjá strandferðsluni. Soleiðis er eisini í ár.

Meðan upprunaliga játtanin til stovnin var samanlagt kr. 42.000.000,00, og við endurskoðaðu fíggjarlógini var skorin niður til kr. 40.529.000,00, verður nýtslan samanlagt kr. 51.000.000,00.

Hóast nýtslan sostatt er góðar 4 milliónir krónur minni enn í fjør og góðar 12 milliónir minni enn í fyrrárið, er meirnýtslan alt ov stór.

Landsstýrið hevur nú sett ávís tiltøk í verk.

Stovnsbygnaðurin verður broyttur sambært viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið fyri 1993.

Nýggjur stjóri er settur, eins og nýggjur fíggjarleiðari, og farið er undir at umleggja bókhaldið við betur fíggjarstýring fyri eyga.

**§ 13. 13279 Bygdaleiðir.**
Bygdaleiðir brúkar í 1992 kr. 347.000,00 minni enn játtað.

**§ 13. Landsverkfrøðingurin. 13094, 13056, 13018, 13227, 13061, 13023, 13037, 13042.**
Samlaða játtanin til landsverkfrøðingsstovnin heldur í 1992. Meðan konto 13056 fyritøkur og útgerð hjá landsverkfrøðinginum, 13061 berghols- og brúgvagerð og

13023 havnagerð verða yvirtrektar við samanlagt kr. 7.047.000,00, er nýtslan á konto 13037 lendingar og 13042 flogferðsla niðurskorin við kr. 8.100.000,00.

Sostatt er samlaða nýtslan hjá landsverkfrøðinginum góða millión minni enn á endurskoðaðu fíggjarlógini fyri 1992.

Hesin peningurin er kortini brúktur undir grein 11 landsverkfrøðingsstova.

**§ 13. Nýteknan av partapeningi í P/F Atlantic Airways.**

Í viðmerkingunum til løgtingslóg nr. 160 frá 1. desember 1992 um at tekna nýggjan partapening í P/F Atlantic Airways verður sagt um avleiðingarnar fyri fíggjarlógina verða, at hallið á landskassaroknskapinum fyri fíggjarlógina fyri 1992 veksur við kr. 75 miliónum krónum við hesi lóg. Og á eykafíggjarlógini fyri 1992 verður upphæddin bókað sum eykajáttan á grein 13, samskifti.

Hinvegin minka landskassans veðhaldsskyldur við kr. 70 miliónum, og í 1993 og 1994 verður ikki longur neyðugt við hesi játtan á grein 21, effektivar veðhaldsskyldur.

**Grein 14.**

**§ 14. 14155 HF- skeið í Suðuroy.**

Meirnýtslan til HF-skeið í Suðuroy verður í 1992 kr. 361.000,00. Av hesum eru kr. 207.796,00 fyri leigu í 1992.

**§ 14. 14174 Eysturoyar studentaskúli og HF- skeið.**

Meirnýtslan hjá Eysturoyar studentaskúla og HF-skeiði í 1992 verður kr. 157.504,80. Hetta er eitt gamalt leigumál, sum landsstýrið ikki er vitandi um fyrr enn í heyst.

**§ 14. 14205 Studentaskúlin og HF-skeið í Hoydølum.**

Nýtslan hjá Studentaskúlanum í Hoydølum verður í 1992 kr. 1.625.000,00 meir enn upprunaliga játtað. Harav er skúlanum givin ein eykajáttan upp á kr. 1.300.000,00 í árinum. Peningurin er fingin til vega við at taka kr. 400.000,00 av fløgum til fólkaskúlan, kr. 300.000,00 av fløgum til savn í Hoyvík og kr. 600.000,00 av fløgum til sjónvarp.

Tær írestandi kr. 325.000,00 stava frá umvælingararbeiði, sum er sett í gongd, men sum núverandi leiðsla ikki visti um.

**§ 14. 14307 Føroya Sjómansskúli.**

Játtanin fyri 1992 var kr. 5.600.000,00. Seinni skerd við knøppum kr. 100.000,00. Hartil kemur arbeiðsloysistrygging 2%. Effektiv játtan til skúlan 1992 er sostatt knappar kr. 5.500.000,00.

2 skipsføraraflokkar vóru tiknir upp í summar. Skúlin metti játtanina at halda. Uppgerð pr. 1. november vísir, at vanliga játtanin verður yvirtrekt við umleið kr. 500.000,00.

Hartil eru samskiftistól keypt fyri kr. 250.000,00 uttan tilmæli frá landsskúlafyrisitingini.

**§ 14. 14397 Tekniski skúli í Klaksvík.**

Meirnýtslan á Tekniska skúla í Klaksvík verður í 1992 kr. 1.100.000,00.

Skúlin er sjálvsognarstovnur, og verður undirskotið á rakstrinum hjá hesum stovni í fyrsta umfari lagt út av landsstýrinum, so alt virksemi ikki steðgar upp.

**§ 14. 14409 Klaksvíkar sjómansskúli og 14675 Sjóvinnuskúli.**

Meirnýtslan hjá Klaksvíkar Sjómansskúla verður í 1992 kr. 674.000,00 meir enn játtað og Sjóvinnuskúlanum kr. 75.000,00.

Klaksvíkar sjómansskúli hevur fingið eina eykajáttan í árinum upp á kr. 250.000,00. Kr. 200.000,00 skulu av játtanini til fløgur Sjómansskúla, umb./nýbygging og kr. 50.000,00 av játtanini til fløgur til fólkaskúlan.

Meirnýtslan fyri bæði rakstrarstøðini verður sostatt kr. 499.000,00.

**§ 14. 14447 Tekniskur skúli í Tórshavn.**

Meirnýtslan hjá Tekniska skúla í Tórshavn verður í 1992 kr. 3.400.000,-00.

Skúlin er sjálvsognarstovnur, og verður undirskotið á rakstrinum hjá hesum stovni í fyrsta umfari lagt út av landsstýrinum, so alt virksemi ikki steðgar upp.

**§ 14. 14656 Landsmiðstøð fyri undirvísingaramboð.**

Nýtslan hjá Landsmiðstøðini fyri undirvísingaramboð verður kr. 572.000,-00 meira enn játtað.

Landsstýrið hevur samtykt at søkja fíggjarnevndina um eina eykajáttan til leigu í 1992 upp á kr. 599.387,50; men enn er málið ikki avgreitt.

**§ 14. 14953/313439 Læruráðið (eftirútbúgving av yrkislærdum).**

Nýtslan á hesi konto verður í 1992 kr. 70.000,00 minni enn játtanin.

Landsstýrið og fíggjarnevnd hava góðkent, at hesin peningur verður heimilaður læruráðnum at nýta á rakstrarstað 18337/103135: Læruráðið. Samsýning av skoðanarmeistarum.

**§ 14. Íløgur. Fólkaskúlin, nýbyggingar.**

Av teimum kr. 7 milliónir, sum eru játtaðar til fólkaskúlan, nýbyggingar, eru, sum nevnt omanfyri kr. 400.000,00 játtaðar til Studentaskúlan í Hoydølum og kr. 50.000,00 til Klaksvíkar sjómansskúla.

**§ 14. Íløgur. Sjómansskúli, umb./ nýbygging.**
Av hesi konto er eykajáttan til Klaksvíkar sjómansskúla upp á kr. 200.000,00.

**§ 14. Íløgur. Miðnámsskúli í Suðuroy.**
Játtanin til miðnámsskúla í Suðuroy er í 1992 upp á kr. 1.500.000.

Arbeiðið er í gongd, men roknast má við, at tað verður arbeiði eftir til umleið kr. 600.000,00, tá árið er úti.

Tí verður søkt um, at hesar kr. 600.000,00 kunnu nýtast í 1993.

**Grein 15.**

**§ 15. 15304 Landsskjalasavn.**
Nýtslan hjá skjalasavninum verður í 1992 kr. 173.000,00 meira enn upprunaliga játtað.

Av hesum hevur skjalasavnið fingið eina eykajáttan í árinum upp á kr. 78.000,00 til flytingina. Peningurin skal takast úr grunninum til bygging av skjalasavni.

Tær ífestandi kr. 95.000,00 stava frá sakarmáli millum magistarafelagið og Føroya Landsstýri.

**§ 15. Íløgur. Savn í Hoyvík. Umvæling.**
Av hesi játtan eru brúktar kr. 300.000,00 til eykajáttan til Studentaskúlan í Hoydølum.

**§ 15. Íløgur. Sjónvarp Føroya nýbygging/umvæling.**
Av hesi játtan eru brúktar kr. 600.000,00 til eykajáttan til Studentaskúlan í Hoyvík.

**Grein 16.**

**§ 16. 16607 Fiskivinnuráð.**
Meimýtslan til fiskivinnuráðið verður í 1992 kr.72.000,00. Av hesi konto verður goldin skrivaraløn, partur av skrivstovuútreiðslunum og fundarpeningur. Í 1992 er tó eingin fundarpeningur útgoldin.

**§ 16. 16436 Studningur til fiskivinnuna.**
Óvissa er um minstuløn - minstaforvinning, serstakliga tær eykaútreiðslur, sum standast av, at reglurnar fyri minstaforvinningi eru broyttar við afturvirkandi kraft.

Hóast hetta, verður roknað við, at kr. 14.000.000 av játtanini ikki verða brúktar í 1992. Tí verður søkt um heimild at nýta henda pening í 1993 á íløgukontoini til fiskiskip, 16436 Studningur til fiskivinnuna.

**§ 16. 16626 Magnus Heinason.**
Meirnýtslan á hesum rakstrarstað verður í 1992 kr. 278.000,00.

**§ 16. 16904/333408 Tiltøk fyri alivinnuna.**
Nýtslan á hesi konto verður í 1992 kr. 11.400.000,00. Upprunaliga játtanin er uppá kr. 2.000.000,00 og eykajáttan er fingin í árinum upp á kr. 9.400.000,00 til endurgjald fyri smolt.

**Grein 17.**

**§ 17. 17048 Landbúnaðarráðgevi.**
Nýtslan í 1992 verður kr. 128.000,00 minni enn játtað.

**Grein 18.**

**§ 18. 18337 Læruráðið.**
Sí viðmerking til rakstrarstað 14953/313439.

**§ 18. 18356 Ferðamannamiðstøðin.**
Til viðgerðar í landsstýrinum er spurningurin um eykajáttan til ferðamannamiðstøðina upp á kr. 500.000,00, og taka peningin av rakstrarstað 18532 Stuðul til Ídnaðarfremjandi endamál.

Samlaða játtanin kemur sostatt at halda.

**§ 18. 18527 Menningargrunnur Ídnaðarins.**
Menningargrunnurin hevur fingið eina eykajáttan í árinum, men tað var so tíðliga á árinum, at hon er tikin við á endurskoðaðu fíggjarlógini.

**§ 18. 18532 Stuðul til ídnaðarfremjandi endamál.**
Sí viðmerkingarnar til rakstrarstað 18356 Ferðamannamiðstøðin.

**§ 18. 18907/353067 Studningur til læruplass.**
Hetta eru lógarbundnar útreiðslur.

Játtanin er upp á kr. 1.700.000,00, men nýtslan í 1992 verður uppá kr. 3.100.000,00.
Meirnýtslan á hesum rakstrarstað verður sostatt kr. 1.400.000,00.

**§ 18. 18907/353146 Ferðaendurgjald til læruplass.**
Hetta eru lógarbundnar útreiðslur.

Játtanin er upp á kr. 200.000,00, men nýtslan í 1992 verður upp á kr. 480.000,00.
Meirnýtslan á hesum rakstrarstað verður sostatt kr. 280.000,00.

**§ 18 Íløgur.**
Við løgtingslóg nr. 152 frá 19. oktober 1992 um lántøku til landskassan er samtykt, at seta m.a. kr. 300 milliónir at skjóta í ein grunn at nýta til nýggjan eginpening í Sjóvinnubankanum, Fíggjargrunnin frá 1992.

**Grein 19.**

**§ 19. Almannamál.**
Generelt kann sigast um grein 19 Almannamál, at játtanin heldur í 1992.

Útreiðslurnar til fólkapensión, avlamispensión og føroyingar á stovni í Danmark hava verið størri í 1992 enn mett í endurskoðaðu fíggjarlógini. Men so er spart á øðrum konti í staðin, so tað gongur upp.

Ein eykajáttan er givin í árinum til Heilbrigdið upp á kr. 838.000,00. Peningurin er fluttur av konto 19403 Vanlig forsorg til konto 1990 4/373305 Landsstýrinum at ráða yvir.

**Grein 20.**

**§ 20. 20013/103599 Danskar eftirlønir.**
Eykajáttanin upp á kr. 200.000,00 er til eftirlønir hjá statstænastumonnum, yvirtiknum statstænastumonnum og reglugerð settum, sum starvast á stovnum, sum heilt ella partvíst áðrenn blokkstuðulsskipanin kom í gildi, vóru goldnar av ríkiskassanum. Peningurin er í blokkinum til endamálið.

**Grein 21.**

**§ 21. 21019 Effektivar veðhaldsbindingar.**
Játtanin til effektivar veðhaldsbindingar er í 1992 upp á kr. 190 milliónir.

Tað er nú greitt, at tað sum fellur til gjaldingar í 1992 verður umleið kr. 36 milliónir meira enn játtað er.

**Grein 22.**

**§ 22. Rentuútreiðslur.**
Sambært uppgerð frá Landsbankanum verða rentuútreiðslurnar av lánum í 1992 kr. 254.000.000,00.

**Grein 26.**

**§ 26. 26305 Ymsar ognarútreiðslur.**
Sí viðmerkingar 11257 Líkningarráðið.

# Álit

# í

*løgtingsmáli nr. 64/1992: Eykafíggjarlógin 1992.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 17. desember 1992 og eftir 1. viðgerð 21. desember 1992 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið, og ger nevndin vart við, at framvegis eru nakrar útreiðslur størri enn játtað er. Nevndin hevur heft seg við eina upphædd undir § 12, har talið fyri eykajáttan er 5 mió. kr. størri enn tað, sum játtað er; hetta bert nevnt sum eitt dømi.

Tá slíkt kemur fyri, heldur fíggjarnevndin, at tað er beinari, at landsstýrið í staðin fyri eitt tal setir upp bæði tað, ið játtað er eyka, og tað, sum er ójáttað.

Fíggjarnevndin er av teirri áskoðan, at tað er skilagott, at landsstýrið strembar eftir at motivera stovnsleiðararnar í spurningunum um at umsita tær játtaðu upphæddirnar.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Dan Petersen, Anfinn Kallsberg, Birgir Danielsen og Asbjørn Joensen) tekur annars undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja tað.

Ein minniluti (Finnbogi Arge) hevur hesar viðmerkingar:

Tá fíggjarlógaruppskotið fyri 1992 var til viðgerðar í fíggjarnevndini í desember í fjør, vístu bæði Sambandsflokkurin og búskaparráðið á, at Føroya landsstýri hevði eina alt ov bjartskygda meting av inntøkumøguleikunum hjá landskassanum.

Eykafíggjarlógin staðfestir tíverri nú, at Sambandsflokkurin og búskaparráðið fingu rætt, hóast hvørgin parturin væntaði, at inntøkumar fóru at svíkja í so stórari mun, sum nú verður staðfest.

Landsstýrið hevði mett inntøkurnar til 2.795 mió. kr., men inntøkurnar gjørdust bert 2.546 mió. kr., tá ið avtornaði, t.v.s. 249 mió. kr. lægri enn mett.

At kalla allar útreiðslugreinirnar á fíggjarlógini hava yvirtrekk. Bert í ávísum førum er heimild fingin frá fíggjarnevndini. Sjúkrahúsini hava brúkt nærum 16 mió. ov nógv og hava bert fingið heimild til helvtina av hesi meirnýtslu.

Á samferðsluøkinum er tað serliga Strandferðslan, sum ikki megnar at liva upp til tølini á fíggjarlógini. Avvarðandi landsstýrismaður hevur bæði í talu og skrift víst á nærløgdu sparingar hjá landsstýrinum á hesum øki, men eykafíggjarlógin staðfestir nú, at her hevur bert verið talan um reyp, tí yvirtrekkið hjá Strandferðsluni táttar í 10 mió. kr.

Á skúlaøkinum eru tað serliga teir teknisku skúlarnir, sum ikki halda seg innanfyri givnu karmarnar.

Mentan, § 15, hevur ikki brúkt meiri enn játtað, tað sama er galdandi fyri fiskivinnuna, § 16. Men undir heitinum "tiltøk til alivinnuna" hevur fíggjarnevndin játtað eyka til alibrúk, sum hava fingið furunkulosu. Fíggjarnevndin hevur heitt á Føroya landsstýri um at lóggeva soleiðis, at veitingar til at avlíva fisk við furunkulosu heldur uppat, tí fiskasjúkur av ymiskum slagi eru vorðnar varandi fortreyt hjá alivinnuni í Føroyum, men enn er einki hent á hesum øki.

§ 17, landbúnaðurin, er hildin innanfyri givnu karmarnar. Tað sama er stórt sæð galdandi fyri § 18, vinnulív og arbeiðsmarknað annars.

Raksturin av almannamálum, § 19, hevur, hóast samlaðu útreiðslurnar liggja á 780 mió. kr., bert eina meirýtslu upp á 0,7 mió. kr. Men ávísar broytingar eru innanfyri greinina, t.d. hevur avlamispensiónin kostað 8,5 mió. meira enn ætlað, og føroyingar á stovni í Danmark 3,5 mió. meira enn roknað varð við. Men sparingar á øðrum almannakonti hava útjavnað hesa meirýtslu.

Annars eru tað serliga tey effektivu veðhaldini og rentuútreiðslur, sum landsstýrið hevur mett skeivt á útreiðslusíðuni. Tey effektivu veðhaldini vóru sett til 80 mió. við ársbyrjan, men við árslok eru 226 mió. brúkar. Rentumar skuldu verið 223 mió., men tá ið avtornaði, er yvirtrekkið 34 mió. kr.

Minnilutin vísir á, at endaliga frávikið á fíggjarlógini fyri 1992 gjørdist 811 mió. kr., og má hetta metast sum eitt prógv fyri, at landsstýrið ikki hevur dugað at mett um veruligu búskapargongdina í tí føroyska samfelagnum í 1992.

Ein annar minniluti (Heini O. Heinesen) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

## Broytingaruppskot

í

*løgtingsmáli nr. 64/1992: Eykafíggjarlógin 1992.*

Undir § 18 verða kr. 300.000 fluttar frá konto 18703: Tiltøk fyri ung til konto nr. 18323: Studningur til kolagrevstur soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 18703 | Tiltøk fyri ung | Tiltag for unge | 4.250 |
| 18323 | Studningur til kolagrevstur | Tilskud til kulminedrift | 550 |

# 65. Broyting í løgtingslóg um rentuskatt

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um rentuskatt.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 87 frá 5. juni 1992 um rentuskatt verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 2, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Skyldu at gjalda rentuskatt eftir hesi lóg hava likamligir persónar og deyðsbúgv, sum hava rætt til tær rentuinntøkur, sum eru nevndar í § 1 í hesi lóg, og sum eru undir skattskyldu eftir § 1 ella § 2 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum."

2) § 2, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"Eisini hava Føroya Sparikassi, Norðoya Sparikassi, Suðuroyar Sparikassi, Føroya Lívstrygging, Tryggingarsambandið Føroyar og allar deildir tess, Íleggingargrunnurin fyri Føroyar, Menningargrunnur Ídnaðarins, Føroya Ídnaðargrunnur og Færøernes Realkreditinstitut skyldu at rinda rentuskatt eftir hesi lóg."

3) Í § 2 verður sum nýtt stk. 4 sett:
"Landsstýrið ásetur nærri reglur

*lagtingslov om ændring af lagtingslov om renteskat.*

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 87 af 5. juni 1992 om renteskat foretages følgende ændringer:

1) § 2, stk. 1 affattes således:
"Pligt til at betale renteskat efter denne lov påhviler fysiske personer og dødsboer, som er berettigede til de renteindtægter, som er anført i denne lovs § 1, og som er skattepligtige i medfør af § 1 eller § 2 i lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer."

2) § 2, stk. 2 affattes således:
"Desuden har Føroya Sparikassi, Norðoya Sparikassi, Suðuroyar Sparikassi, Føroya Lívstrygging, Tryggingarsambandið Føroyar og dets samtlige afdelinger, Íleggingargrunnurin fyri Føroyar, Menningargrunnur Ídnaðarins, Føroya Ídnaðargrunnur og Færøernes Realkreditinstitut pligt til at betale renteskat efter denne lov."

3) I § 2 indsættes som nyt stk. 4:
"Landsstyret fastsætter nærmere

fyri uppgerð og avrokning av rentuskatti eftir stk. 3."

4) § 3, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"Renta, sum verður tilskrivað konti hjá likamligum persóni og deyðsbúgvum verður skattað við 18% p.a., roknað av tilskrivaðu rentuupphæddini og við 22% p.a., um kontohavarin er ein av teimum í § 2, stk. 2 nevndu sparikassum, tryggingarfeløgum, grunnum ella stovnum. Rentuskattur eftir hesi lóg umfatar tó ikki rentu, umfatað av § 4 í rentutryggingarlógini."

5) Í § 8 verður stk. 2 strikað og stk. 3 verður hereftir stk. 2.

§ 2.

Henda lóg fær gildi 1. januar 1993.

regler for opgørelse og afregning af renteskat i henhold til stk. 3."

4) § 3, stk. 1 affattes således:

"Rente, som tilskrives en fysisk persons og dødsboers konti beskattes med 18% p.a., beregnet af den tilskrevne rente og med 22% p.a., når kontohaveren er en af de i § 2, stk. 2 nævnte sparekasser, forsikringsselskaber, fonde og institutioner. Renteskat i henhold til denne lov omfatter dog ikke rente, der omfattes af § 4 i renteforsikringsloven."

5) I § 8 ophæves stk. 2 og stk. 3 bliver herefter stk. 2.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1993.

**Viðmerkingar:**

Landsstýrið hevur í løtuni samráðingar við peningastovnarnar um rentustøðið. Rentuskattaprosentið kann tí verða eitt annað enn tað, sum ásett er í broyting nr. 4 (§ 3).

Hesar samráðingar hava drigið út og væntast kann ikki, at peningastovnarnir hava nakra felagsstøðu fyrr enn í byrjanini av januar 1992.

Á fíggjarlógaruppskotinum fyri 1993 er roknað við eini inntøku frá rentuskatti svarandi til 18%. Um lánirentan verður lækkað og skattafrádrátturin harvið minkar, kann rentuskattaprosentið lækkast og broytast, áðrenn henda lóg verður endaliga samtykt.

Skattaprosentið 22% fyri sparikassar, tryggingarfeløg v.m. svarar til nýggja skattaprosentið fyri partafeløg. Roknast kann við, at hesir stovnar um ikki so langa tíð verða skattaðir sum partafeløg.

Víst verður annars til felagsviðmerkingarnar í løgtingsmáli nr. 35/1992: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

# Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 65/1992: Broyting í løgtingslóg um rentuskatt.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 17. desember 1992 og eftir 1. viðgerð 26. januar 1993 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið. Nevndin hevur verið á fundi við umboð fyri Føroya Lívstrygging og skattaumsitingina og við landsstýrismannin í skattamálum.

Uppskotið varð lagt fyri tingið longu miðskeiðis í desember 1992 og varð tá ætlanin at nýggja lógin skuldi koma í gildi 1. januar 1993. Til lógaruppskotið vórðu somuleiðis gjørdar fylgibroytingarnar í skattalógini, sum eru samtyktar og lýstar - løgtingslóg nr. 191 frá 28. desember 1992. Sum er, er ikki samsvar millum skattalógina og rentuskattalógina skattskyldugum feløgum viðvíkjandi, av tí at fyriliggjandi uppskot ikki er avgreitt.

Í uppskotinum er roknað við 18% í rentuskatti fyri persónligar skattgjaldarar, meðan partafeløg hereftir ikki gjalda rentuskatt, men sum heild rinda skatt 22%. Galdandi lóg sigur ávikavist 9% og 18%.

Vansarnir við ósamsvarinum, tí hetta uppskotið ikki er samtykt og lógarfest, eru m.a. at Postgirostovan, ið hevur mánaðarligar rentutilskrivingar, hevur skuldskrivað kontohavarnar við 9% í rentuskatti og eisini hava peningastovnarnir roknað við 9% í rentuskatti, har rentutilskriving er gjørd.

§ 3, stk. 1 verður broytt fyri at gera greiðari, at rentur, bæði fyri eftirlønarskipanir í peningastovni og hjá lívstryggingarfeløgum rinda ikki rentuskatt eftir hesi lóg.

Skal lógin setast í gildi afturvirkandi til 1. januar 1993 sum er vána lóggávusiður - mugu tær gjørdu rentutilskrivingarnar javnast og eftirkrevjast.

Meirilutin í nevndini (Jacob Lindenskov, Heini O. Heinesen, Lasse Klein og Jógvan Sundstein) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins, men at orðini "§ 4 f" undir punkt 4) í § 1 í uppskoti landsstýrisins gongur út, og at lógin fær gildi frá tí, hon verður lýst. Rentubroytingin fyri persónar kemur í gildi 1. juli 1993. Broytingaruppskot hesum samsvarandi verður sett fram.

Undir viðgerðini av hesum máli er nú hent tað, at nýskipaða landsstýrið skjýtur upp fyri tinginum at hækka rentuskattin við tí endamáli at styrkja gjaldføri landskassan. Sambært inntøkuuppskoti landsstýrisins verður rentuskatturin fyri "likamligar persónar og deyðsbúgv" 22%.

## Broytingaruppskot

## til

## uppskot landsstýrisins

1) Í § 1 pkt. 4 verður í staðin fyri "18%" sett "22%" og "§ 4 f" ganga út.

2) § 2 verður soljóðandi:
"Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Stk. 2.** Broyting nr. 1 í § 1 verður galdandi fyri rentu, sum verður tilskrivað konti hjá skattskyldugum feløgum frá og við 1. januar 1993.

**Stk. 3.** Broyting nr. 4 verður galdandi fyri rentu, sum verður tilskrivað frá og við 1. juli 1993.

1) I § 1 pkt. 4 ændres "18%" til "22%" og "§ 4 i" udgår.

2) § 2 formuleres:
"Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

**Stk. 2.** Ændring nr. 1 i § 1 er gældende for rente der tilskrives konti hos skattepligtige selskaber fra og med den 1. januar 1993.

**Stk. 3.** Ændring nr. 4 er gældende for rente, der tilskrives fra og med 1. juli 1993.

Minnilutin (Jógvan Sundstein) tekur sum frammanfyri nevnt undir við upprunauppskoti landsstýrisins við teimum undir punkt 2) nevndu broytingum.

Hinvegin kann minnilutin ikki taka undir við broytingini í punkt 1), har rentuskatturin fyri persónar verður hækkaður frá 18% til 22%, og mælir frá at samtykkja hesa broyting.

Ein annar minniluti (Finnbogi Arge) hevur hesa støðu til lógaruppskotið.

Tá undanfarna samgonga millum Javnaðarflokkin og Fólkaflokkin hækkaði rentuskattin úr 7% til 9%, mótmælti Sambandsflokkurin harðliga. Flokkurin vísti á, at fór rentuskatturin á glið, so var stórur vandi fyri, at føroyskir politikarar ikki fingu afturhald.

Tíverri var hesin spádómur rættur. Longu við árslok 1992 samdust Javnaðar- og Fólkaflokkurin um at hækka rentuskattin til 18% fyri persónligar skattgjaldarar og 22% fyri feløg. Lógaruppskotið var lagt fram tann 17. desember, og tað hevur síðani verið til viðgerðar í skattanevndini.

Nýggja samgongan millum Javnaðar- og Tjóðveldis- og Sjálvstýrisflokkin hevur nú avgjørt at hækka rentuskattin enn meira, soleiðis at rentuskatturin fyri privatpersónar eisini verður 22%.

Fólk kunnu vera ósamd, um rentuskattaskipanin hevur verið rættvís ella ei. Men eingin, uttan mun til hugsjónarliga sannføring, sleppur undan tí veruleika, at

rentuskattaskipanin hevur verið við til at tryggja innskotið í føroysku bankunum og sostatt eisini bøtt um gjaldføri landsins.

Búskaparkreppan hevur gjørt sítt til, at føroyingar hava flutt hundraðtals milliónir av landinum. Peningur, sum fyrr kundi lænast út til føroyskar skattaborgarar og vinnulív, stendur nú bundin í útlendskum virðisbrøvum í staðin.

Men hóttanin um hægri rentuskatt hevur eisini fingið einstaklingar og virkir at flyta pening av landinum. Einki er at ivast í, at enn fleiri fara at taka táttin upp, nú nýggja samgongan longu hevur avgjørt at hækka rentuskattin enn einaferð.

Eitt samfelag, sum vantar gjaldføri, eigur at stimbra hugin hjá ognarfólki at flyta pening inn í landið. Men hetta landsstýrið eins og tað undanfarna, ger tað øvugta. Hetta er sera stuttskygdur politikkur, og tað verður tann føroyski skattaborgarin, sum í síðsta enda verður fyri vanbýti.

Samgongutingfólk áttu at vitað, at hægri rentuskattur hevur hægri rentustøði við sær. Hetta fer at tyngja um hjá vinnulívinum, og scthúsaeigarar, sum frammanundan eru í tuplari støðu, verða eisini fyri bakkasti.

Hóast rentustøðið í Europa er lækkandi og helst fer at lækka enn meira, um danir siga ja til Edinburgh avtaluna um eina viku, fara føroyingar ikki at fáa somu rentulækking sum aðrir orsakað av hækkaða rentuskattinum.

Minnilutin (Finnbogi Arge) tekur ikki undir við at hækka rentuskattin og mælir tinginum til at fella uppskot landsstýrisins.

Vísandi til hættisliga gjaldføristrotið setir minnilutin fram soljóðandi:

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Landsstýrinum verður álagt at leggja fram lógaruppskot, sum tekur allan rentuskatt av - bæði fyri vinnufeløg og persónligar skattgjaldarar.

# 66. Skipan millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirættindi í 1993

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Vísandi til § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond, góðkennir løgtingið hjáløgdu avtalu frá 26. november 1992 millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirættindi í 1993.

**Viðmerkingar:**

Váttaða frásøgnin frá fundinum millum føroyskar og norskar myndugleikar í Tórshavn 26. november 1992 um sínámillum fiskirættindi í 1993 er løgd hjá.

Samráðingarnar við Noreg gjørdust truplar. Orsøkin til hetta var fyrst og fremst, at føroysk skip vóru løgd undir ovfisking av kvotunum í Barentshavinum í 1992.

Frá føroyskari síðu varð víst til, at fundur hevur verið millum John Petersen, landsstýrismann í fiskiveiðimálum og norska fiskmálaráðharran Jan Henry T. Olsen um hetta mál í november 1992. Niðurstøðan av hesum fundi var at føroyskir myndugleikar fara at skerpa eftirlitið við føroyskum landingum. Somuleiðis skulu Føroyar binda seg til at avmarka heildarveiðu sína til tað, ið er ásett í avtalunum við Noreg og Russland.

Viðvíkjandi fyritreytunum fyri samráðingunum um kvotur norðanfyri 62 gr. n. br. verður víst til løgtingsmálið um skipan millum Føroyar og Russland um sínámillum fiskirættindi í 1993.

Samráðingarnar við Noreg 26. november 1992.

Tað má sigast at útgangsstøðið í samráðingunum við skuldsetingum um ovfisking var ógvuliga veikt hjá føroysku sendinevndini.

Hvussu álvarsligt hetta hevur verið, er dømi um at Finnmark Fiskarlag hevur mælt til, at tann nøgd, ymsu londini hava ovfiskað, skal takast burtur av kvotuni fyri 1993, og um ovfiskingin hevur verið størri enn 50%, skulu londini ikki tillutast kvotur fyrr enn í 1994.

Noreg kundi ikki leggja fram prógv um føroyska ovfisking, men teirra orðing varð førd fram og sett í sáttmálan. Fört varð somuleiðis inn í váttaðu frásøgnina,

at Føroyar skulu avmarka heildarveiðu sína til tað, ið er ásett í avtalunum við Noreg og Russland, og at eftirlitið við landingunum verður skerpað. Víst verður til punkt I. A. síðu 2.

**Samráðingarúrslit:**

Úrslitið gjørdist, at føroyska toskakvotan í norskum sjógvi í 1993 verður 2.000 tons, og kvotan er økt 555 tons. Hetta er nakað minni enn økingin í TAC'num. Yvirflytingin frá russiskum sjógvi er nakað minni enn fyri 1992.

Svalbard er ikki beinleiðis við í sáttmálanum, har fáa Føroyar eitt ávíst prosent av TAC'num fyri tosk. Fyri 1992 var toskakvotan við Svalbard 410 tons, í 1993 er hon 650 tons. Rækjudagatalið er óbroytt.

Lodnukvotan er fyri 1993 9.000 tons. TAC'ið á vetrarlodnu er minkað niður í 600.000 tons úr 834.000 tonsum í 1992.

Upsakvotan í Norðsjónum er sett niður aftur til kvotuna í 1991, 2.800 tons. Makrelkvotan er tann sama sum fyri 1992, og Føroyar fingu eina 5.000 tons rossamakrelkvotu.

Noreg fekk eina minni botnfiskakvotu við Føroyar, 5.500 tons móti 6.300 tonsum í 1992. Føroyski parturin førdi fram, at botnfiskastovnarnir eru illa fyri, og at vit ynsktu, at Noreg fylgdi við í niðurgongdini hjá stovnunum, eins og vit gjørdu, tá toskastovnurin í Barentshavinum var illa fyri.

Hjálagt er yvirlit yvir føroysku og norsku kvoturnar 1990-1993.

Talið av fiskiloyvum er óbroytt.

## Álit

## í

*løgtingsmál nr. 66/1992: Skipan millum Føroyar og Noreg um sinamillum fiskirættindi í 1993.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 22. desember 1992 og eftir 1. viðgerð 14. januar 1993 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins til samtyktar.

# 67. Skipan millum Føroyar og Russland um sínámillum fiskirættindi í 1993

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Vísandi til § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond góðkennir løgtingið hjáløgdu avtalu frá 2. desember 1992 millum Føroyar og Russland um sínámillum fiskirættindi í 1993.

**Viðmerkingar:**

Váttaða frásøgnin frá 16. fundinum í føroysku-russisku felagsnevndini uni sínámillum fiskivinnumál er hjáløgd. Samráðingarnar fóru fram í Murmansk 30. november - 2. desember 1992.

Samráðingarnar vóru truplar. Tær vóru merktar av at russiski parturin førdi fram, at upplýsingar eru komnar fram um, at føroysk skip hava ovfiskað av føroyskum kvotum í Barentshavinum. Stórur dentur varð lagdur á hetta mál av tí, at hvørgin partur kann góðtaka at kvotur, ið eru ásettar sambært fiskivinnusamráðingum, verða ovfiskaðar. Tá dettur álitið og virðingin partanna millum burtur.

Føroyski parturin greiddi frá, at veiðieftirlitið verður skerpað, og at setast kundi orðing í váttaðu frásøgnina um, at Føroyar ikki skuldi hava størri veiðu enn tær kvotur, ið eru ásettar sambært fiskivinnusáttmálarnar við Russland og Noreg.

Eins og í sáttmálanum fyri 1992 er grein um, at partarnir vilja arbeiða fyri víðkaðum samstarvi millum feløg og virki innan fiskivinnuna. Ein serlig nevnd skal setast í seinasta lagi januar 1993 at fáa gongd á hetta. Víst verður til grein VIII í váttaðu frásøgnini.

**Fyritreytirnar fyri samráðingunum:**

Í norsk-russisku sínámillum fiskivinnunevndini áseta londini, hvussu stór heildarveiðin skal vera í Barentshavinum og hvussu nógv kann latast triðjalondum.

Fyri 1993 øktist TAC'ið á toski til 500.000 tons úr 300.000 tonsum í 1992. Triðjalandskvotan í 1993 hjá Noreg er 26.400 tons og hjá Russlandi 17.600 tons. Fyrr fingu Føroyar alla triðjalandskvotuna hjá Russlandi, men í 1992 hevur

Russland gjørt fiskiveiðusáttmála við Grønland, og verður ein partur latin teimum. Noreg letur EF ein stóran part, 20.500 tons, og restin verður latið Føroyum og Grønlandi.

Gongdin í TAC-num fyri tosk í Barentshavinum hevur verið henda:

| | TAC frá fiskifrøðingum | Heildarkvota ásett |
|---|---|---|
| 1986 | < 446.000 | 400.000 |
| 1987 | < 645.000 | 560.000 |
| 1988 | (530.000) 363.000 | (578.000) 451.000 |
| 1989 | 300.000 | 360.000 |
| 1990 | 172.000 | 163.000 |
| 1991 | 215.000 | 215.000 |
| 1992 | 300.000 | 300.000 |
| 1993 | 500.000 | 500.000 |

Heildarkvotan fyri hýsu í 1993 er ásett til 72.000 tons. Hon var í 1992 55.000 tons og í 1991 25.000 tons.

**Úrslitið av samráðingunum.**

Í 1993 gjørdist føroyska kvotan 14.800 tons av toski og hýsu, íroknað hjáveiðu. Hetta er nærum tað mesta, Russland kundi lata, av tí at Grønland eisini skal hava burtur av triðjalandskvotuni upp á 17.600 tons.

Tað má sigast at útgangsstøðið í samráðingunum við skuldsetingum um ovfisking var ógvuliga veikt hjá føroysku sendinevndini.

Russland kundi ikki koma við prógvum um føroyska ovfisking, men fórt varð inn í váttaðu frásøgnina, sí punkt VI g, at Føroyar skulu avmarka heildarveiðu sína til ta veiðu, ið er ásett í avtalunum við Noreg og Russland.

Heildarveiðan fyri vetrarlodnu er minkað niður í 600.000 tons úr 834.000 tonsum í 1992. Russland fær 194.000 tons av hesi kvotu.

Í 1993 verður lodnukvotan frá Russlandi 8.000 tons. Tað var sera óvæntað, at Russland bert kundi lata 8.000 tons, av tí at henda kvotan vanliga hevur verið 20.000 tons. Russiski parturin førdi fram, at teir ynsktu at avmarka veiðuna fyri at verja lodnustovnin, og tí hevði mælt til at seta heildarveiðuna niður.

Teirra kvota var ov lítil til teirra egnu skip, eftir at tey hava mist veiðumøguleikar í Atlantshavinum og Kyrrahavinum.

Í 1993 er russiska kvotan av svartkjafti 140.000 tons, ein øking upp á 20.000 tons.

Talið av fiskiloyvum hjá báðum pørtum er tað sama sum fyri 1992, tó verður í 1993 loyvt 15 russiskum skipum at veiða á føroyskum fiskiøki frá 1. november til 31. desember móti 10 í 1992.

Hjálagt er yvirlit yvir føroysku og russisku kvoturnar 1990-1993.

**Álit**

**í**

*løgtingsmál nr. 67/1992: Skipan millum Føroyar og Rusland um sínámillum fiskirættindi í 1993.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 22. desember 1992 og eftir 1. viðgerð 14. januar 1993 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins til samtyktar.

# 68. Skipan um loyvi at binda upp í samstarvsavtalur millum vinnufyritøkur úr Føroyum og Russlandi/Baltisku londunum eyka kvotur av svartkjafti í føroyskum sjógvi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Vísandi til § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond góðkennir løgtingið niðanfyri nevndu skipan.

Skipanin ber í sær, at loyvt skal verða at binda upp til 40.000 tons av svartkjafti sum eyka kvotur í føroyskum sjógvi upp í samstarvsavtalur millum vinnufyritøkur úr Føroyum og Russlandi/Baltisku londunum. Til hesa eyka kvotu kunnu 8 skip afturat fáa fiskiloyvi undir Føroyum. Landsstýrið skal góðkenna samstarvsavtalurnar við tí fyri eyga, at støðið undir almennu avtalunum við Russland og Baltisku londunum viðvíkjandi býti av fiski ikki verður tikið undan.

**Viðmerkingar.**

Í fiskivinnusáttmálunum við Russland og Baltisku londunum er ásett at partarnir skulu virka fyri samstarvi millum vinnufyritøkur í Føroyum og Russlandi/ Baltisku londunum.

Víst verður til grein VIII í váttaðu frásøgnini frá 16. fundi í føroysku-russisku felagsnevndini um sínámillum fiskivinnumál, undirritað í Murmansk 2. desember 1992. Víst verður somuleiðis til fundarsemjurnar frá samráðingunum við Estland og Lettland í Tórshavn 3. og 5. november 1992.

Í samband við hetta er ynski um, at skip úr hesum londum kunnu fáa eyka kvotur av svartkjafti í føroyskum fiskiøki, og at loyvt verður at binda upp í samstarvsavtalur millum vinnufyritøkur úr Føroyum og Russlandi/Baltisku londunum eyka kvotur av svartkjafti í føroyskum sjógvi.

## Álit

## í

*løgtingsmál nr. 68/1992: Skipan um loyvi at binda upp í samstarvsavtalur millum vinnufyritøkur úr Føroyum og Russlandi/ Baltisku londunum eyka kvotur av svartkjafti í føroyskum sjógvi.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 22. desember 1992 og eftir 1. viðgerð 14. januar 1993 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

# 69. Skipan millum Føroyar og Estland um sínámillum fiskirættindi í 1993

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Vísandi til § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond góðkennir løgtingið hjáløgdu avtalu frá 5. november 1992 millum Føroyar og Estland um sínámillum fiskirættindi í 1993.

**Viðmerkingar:**

Fundarsemjan frá samráðingunum við Estland er hjáløgd.

Samráðingarnar við Baltisku londini vóru heftar av, at TAC'ið fyri toskin í Eystursjónum er minkað við 60% og farið niður í 40.000 tons. Tískil var ógvuliga avmarkað, hvussu nógvan tosk tey kundu lata av teirra parti av kvotuni.

Baltisku londini ynsktu at fáa somu nøgd av svartkjafti, og frá føroyskari síðu var einki ynski um, at støðið í sáttmálanum fór niður. Tí var semja um at lata somu nøgd av svartkjafti sum í fjør í býti við minni nøgd av toski enn í fjør, men økta kvotu av laksi og sild. Umframt hetta inngongur fyri fyrstu ferð brislingur í avtaluna.

Hetta varð gjørt við atliti til ta ringu støðu hjá fiskivinnuni eftir broytingarnar í Baltisku londunum og tí toskastovnurin er illa fyri.

Ein grein er um, at partarnir vilja virka fyri samstarvi millum vinnuna hjá báðum londunum.

Niðanfyri er yvirlit, ið vísir estisku og føroysku kvoturnar í 1992 og 1993. Talið av fiskiloyvum er tað sama bæði árini.

**Estiskar kvotur í føroyskum sjógvi (tons).**

| | 1992 | 1993 |
|---|---|---|
| Svartkjaftur | 6.000 | 6.000 |

**Føroyskar kvotur í estiskum sjógvi (tons).**

| | 1992 | 1993 |
|---|---|---|
| Toskur | 500 | 300 |
| Laksur | 20 | 25 |
| Sild | 200 | 800 |
| Brislingur | 0 | 800 |

## Álit

í

*løgtingsmál nr. 69/1992: Skipan millum Føroyar og Estland um sínamillum fiskirættindi í 1993.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 22. desember 1992 og eftir 1. viðgerð 14. januar 1993 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins til samtyktar.

# 70. Skipan millum Føroyar og Lettland um sínámillum fiskirættindi í 1993

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Vísandi til § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond góðkennir løgtingið hjáløgdu avtalu frá 3. november 1992 millum Føroyar og Lettland um sínámillum fiskirættindi í 1993.

**Viðmerkingar:**

Fundarsemjan frá samráðingunum við Lettland er hjáløgd.

Samráðingarnar við Baltisku londini vóru heftar av, at TAC'ið fyri toskin í Eystursjónum er minkað við 60% og farið niður í 40.000 tons. Tískil var ógvuliga avmarkað, hvussu nógvan tosk, tey kundu lata av teirra parti av kvotuni.

Baltisku londini ynsktu at fáa somu nøgd av svartkjafti, og frá føroyskari síðu var einki ynski um, at støðið í sáttmálanum fór niður. Tí var semja um at lata somu nøgd av svartkjafti sum í fjør í býti við minni nøgd av toski enn í fjør, men økta kvotu av laksi og sild. Umframt hetta inngongur fyri fyrstu ferð brislingur í avtaluna.

Hetta varð gjørt við atliti til ta ringu støðu hjá fiskivinnuni eftir broytingarnar í Baltisku londunum og tí toskastovnurin er illa fyri.

Ein grein er um, at partarnir vilja virka fyri samstarvi millum vinnuna hjá báðum londunum.

Niðanfyri er yvirlit, ið vísir lettisku og føroysku kvoturnar í 1992 og 1993. Talið av fiskiloyvum er tað sama bæði árini.

**Lettiskar kvotur í føroyskum sjógvi (tons).**

| | 1992 | 1993 |
|---|---|---|
| Svartkjaftur | 12.000 | 12.000 |

**Føroyskar kvotur í lettiskum sjógvi (tons).**

| | 1992 | 1993 |
|---|---|---|
| Toskur | 1.000 | 600 |
| Laksur | 20 | 30 |
| Sild | 500 | 2.000 |
| Brislingur | 0 | 2.000 |

## Állt

## í

*løgtingsmál nr. 70/1992: Skipan millum Føroyar og Letland um sínamillum fiskirættindi í 1993.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 22. desember 1992 og eftir 1. viðgerð 15. januar 1993 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

# 71. Bekendtgørelse nr. 63 af 14. juni 1990

om aftale af 17. maj 1989 mellem den danske regering, Færøernes Landsstyre og Grønlands Hjemmestyre på den ene side og Det Internationale Havundersøgelsesråd på den anden side

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið góðkennir, at "Bekendtgørelse nr. 63 af 14. juni 1990 om aftale af 17. maj 1989 mellem den danske regering, Færøernes Landsstyre og Grønlands Hjemmestyre på den ene side og Det Internationale Havundersøgelsesråd på den anden side" verður kunngjørd í Føroyum.

**Viðmerkingar:**

Í kunngerðini (hjáløgd) verður sagt, at Føroyar og Grønland hava fingið rætt til at vera eygleiðarar hjá Altjóða Havgranskingarstovninum (ICES) frá tí, at avtalan millum donsku stjórnina, Føroya Landstýri og grønlendska heimastýrið øðrumegin og Altjóða Havgranskingarstovnin hinumegin varð undirskrivað 17. mai 1989.

Hetta hevur í praksis verið galdandi, síðani avtalan varð undirskrivað í 1989, men avtalan er ongantíð lýst í Føroyum.

**Álit**

**í**

*løgtingsmáli nr. 71/1992: Bekendtgørelse nr. 63 af 14. juni 1990 om aftale af 17. maj 1989 mellem den danske regering, Færøernes Landsstyre og Grønlands Hjemmestyre på den ene side og Det Internationale Havundersøgelsesråd på den anden side.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 22. desember 1992 og eftir 1. viðgerð 15. januar 1993 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins til samtyktar.

# 72. Avtøka av ymsum løgtingslógum

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um avtøku av ymsum løgtingslógum.*

§ 1.

Løgtingslóg nr. 111 frá 3. august 1990 um prísískoyti til ráfisk við seinni broytingum verður sett úr gildi.

§ 2.

Henda lóg fær gildi 1. januar 1993.

*lagtingslov om ophævelse af forskellige lagtingslove.*

§ 1.

Lagtingslov nr. 111 af 3. august 1990 om pristilskud til råfisk med senere ændringer ophæves.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1993.

**Viðmerkingar:**

Sambært uppskoti um játtan til fiskivinnuna á § 16 í uppskotinum til fíggjarløgtingslóg fyri 1993 verður ongin kilostudningur til ráfisk í 1993.

Sambært lógini um prísískoyti verður prísískoytið ásett fyri 6 mánaðir í senn galdandi frá 1. apríl og frá 1. oktober. Galdandi prísískoyti eru sostatt í gildi til 31. mars 1993.

Skal útgjaldingin av prísískoyti steðga 1. januar 1993, er neyðugt, at lógin um prísískoyti verður sett úr gildi sama dag.

Løgtingslóg um stuðul til feskfiskaskip, sum avreiða í Føroyum, verður løgd fyri løgting, so nýggja skipanin fær gildi frá 1. januar 1993.

# Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 72/1992: Avtøka av ymsum løgtingslógum.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 22. desember 1992 og eftir 1. viðgerð 22. desember 1992 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini fingið skriv frá Føroya Fiskimannafelag um málið.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Henrik Old, Jógvan A. Johannessen, Anfinn Kallsberg og Olaf Olsen) vísir á, at landsstýrið í uppskotinum skjýtur upp at seta løgtingslóg nr. 111 frá 3. august 1990 um prísískoyti til ráfisk við seinni broytingum úr gildi. Meirilutin ger í hesum sambandi vart við, at kunngerð nr. 6 frá 24. januar 1992 um tvungna uppboðssølu er lýst við heimild í nevndu lóg, og fer henda kunngerð tí úr gildi, samstundis sum lógin verður sett úr gildi.

Landsstýrið upplýsir í viðmerkingunum, at sama dag, sum lógin um prísískoyti verður sett úr gildi, skal nýggj skipan um stuðul til feskfiskaskip, sum avreiða í Føroyum, fáa gildi. Landsstýrið hevur lagt fram uppskot til løgtingslóg um stuðul til feskfiskaflotan. Henda lóg verður galdandi fyri feskfiskafør yvir 20 BRT. Ætlanin er eisini at gera líknandi skipan fyri fiskifør undir 20 BRT, og hevur landsstýrið upplýst, at lógaruppskot um hesa skipan er gjørt, og at lógin skal fáa gildi frá sama degi, sum lógin um prísískoyti til ráfisk verður sett úr gildi.

Landsstýrið skjýtur upp, at lógin fær gildi 1. januar 1993. Nú januar mánaði er liðugur, mælir meirilutin til, at lógin fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og setir tí fram broytingaruppskot hesum viðvíkjandi. Meirilutin mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins við nevndu broyting og setir samsvarandi hesum fram soljóðandi:

**broytingaruppskot**

**til**

**uppskot landsstýrisins**

| | |
|---|---|
| § 2 verður soljóðandi: | § 2 formuleres således: |
| "Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd." | "Denne lov træder i kraft dagen efter, den er bekendtgjort." |

Minnilutin (Jógvan Ingvard Olsen og Terje Davidsen) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram. Víst verður annars til viðmerkingarnar í álitinum í tingmáli nr. 81/1992: Løgtingslóg um stuðul til feskfiskaflotan.

Minnilutin (Heini O. Heinesen) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram. Víst verður annars til viðmerkingarnar í álitinum í tingmáli nr. 81/1992: Løgtingslóg um stuðul til feskfiskaflotan.

# 73. Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald.*

*lagtingslov om ændring i lagtingslov om meromsætningsafgift.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 við seinni broytingum um meirvirðisgjald verður gjørd henda broyting:

Í § 13 verður sum nýtt stk. 9 sett:

"**Stk. 9.** Virki, ið keypa mjólk frá bøndrum, skulu ikki rokna upphæddir, sum stava frá sølu av mjólk og mjólkarvørum til skrásettar smásølur ella til skrásett virki, ið skulu brúka vørurnar til víðari framleiðslu, við í avgjaldsskyldugu søluna."

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 136 af 8. september 1992 med senere ændringer om meromsætningsafgift foretages følgende ændring:

I § 13 indsættes som nyt stk. 9:

"**Stk. 9.** Virksomheder, som indkøber mælk fra bønder, skal ikke medregne beløb, som hidrører fra salg af mælk og mælkeprodukter til registrerede detaillvirksomheder eller til registrerede virksomheder, som skal bruge varerne til videre fremstilling, til den afgiftspligtige omsætning."

**§ 2.**

Henda lóg fær gildi 1. januar 1993.

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft 1. januar 1993.

**Viðmerkingar:**

Undir viðgerðini av uppskoti til løgtingslóg um merivirðisgjald samtykti løgtingið at áleggja landsstýrinum at leggja fyri løgtingið uppskot um áseting av landbúnaðargjaldi og hækking av mjólkarstudninginum til partvíst endurgjald fyri meirvirðisgjaldið.

Hvat ásetan av landbúnaðargjaldi viðvíkur, so metir landsstýrið, at hesin spurningur longu er avgreiddur av løgtinginum í sambandi við løgtingslóg nr. 121 frá 23. desember 1991 um toll, jbr. Kap. 5, § 10 í lógini. Í toll- og vøruskránni er, hvat landbúnaðargjaldi viðvíkur, viðmerkt við "L", at Føroyar tilskila sær rætt at áleggja útjavningartoll til tess at tálma beinleiðis og óbeinleiðis stuðli í útlondum, ið er ella má væntast at verða til skaða fyri føroyska vinnu.

Landsstýrið fer tí, eftir at góðkenning er fingin frá løgtingsins marknaðarnevnd at áseta landbúnaðargjøld í næstum fyri mjólk og mjólkarúrdráttir.

Eftir er parturin av løgtingssamtyktini um hækking av mjólkarstudninginun til partvíst endurgjald fyri meirvirðisgjaldið.

Hetta kann gerast á ymiskan hátt:

1) At hækka studningin til mjólkarframleiðsluna.
2) Partvís endurrindan av mvg, soleiðis at útsøluprísurin ikki verður hægri enn 8,98 kr./liturin, soleiðis sum skattanevndin eisini helt vera rímiligt undir løgtingsins viðgerð av løgtinglóg um meirvirðisgjald.

Landsstýrið hevur valt ta seinnu loysnina orsakað av, at verður studningurin til mjólkarframleiðsluna hækkaður, so hann gevur út móti netto endurgjald fyri meirvirðisgjaldinum, fer hann lættari at eggja til størri mjólkarframleiðslu, sum møguligt er at selja ella virka í Føroyum.

Sambært uppskoti landsstýrisins, eigur mjólkarstudningurin at kunna lækkast. Mjólkarstudningurin verður ásettur fyri hvønn ársfjórðing. Landsstýrið fer at fylgja við, hvussu henda broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald fer at ávirka inntøkumar hjá bóndum og Mjólkarvirki og fer at áseta mjólkarstudningin fyri árið, soleiðis at mvg ikki ávirkar inntøkumar.

Uppskot landsstýrisins kann lýsast við niðanfyri standandi dømi.

Talva 1. vísir núverandi skipan og talva 2 vísir uppskot landsstýrisins.

**Talva 1**

| | | prísur uttan avgj. kr./1. | inngj. avgj. kr./1. | útg. avgj. kr./1. | avgj. upph. kr./1. |
|---|---|---|---|---|---|
| mjólka-framl. (studn.) | keyp<br>søla | 4.35<br>1.31 | | | |
| MBM | keyp<br>søla | 4,35<br>7.50 | | | |
| sølulið | keyp<br>søla | 7,50<br>8.63 | | | |

**Talva 2**

| | | prísur uttan avgj. kr./1. | inngj. avgj. kr./1. | útg. avgj. kr./1. | avgj. upph. kr./1. |
|---|---|---|---|---|---|
| mjólka-framl. (studn.) | keyp<br>søla | 0<br>4.66<br>0.77 | | 1.07 | 1.07 |
| MBM | keyp<br>søla | 4.66<br>6.35 | 1.07 | 1,46 | |
| sølulið | keyp<br>søla | 6.35<br>7.30 | 1.46 | 1.68 | 0.22 |

Mjólkarframleiðarin er mvg-skrásettur og krevur upp mvg við sølu av mjólk. Sambært dóminum avroknar hann 1,07 kr. til landskassan. MBM fær tilfakturerað 1,07 kr. frá mjólkarframleiðaranum og hevur sum mvg-skyldugt virki frádrátt fyri hetta avgjald. Sambært dóminum vil MBM, tá ið mjólkin verður seld, krevja upp 1,46 kr. frá smásøluni. Tá ið MBM skal avrokna við landskassan, kann virkið seta útgangandi avgjald til 0, soleiðis at MBM fær alt tilfakturerað avgjald afturrindað.

Smásølan kann, hóast MBM setur útgangandi mvg til 0, rokna tað veruliga tilfaktureraða mvg, sum í hesum døminum er 1,46 kr. við í inngangandi avgjald. Tá ið smásølan avroknar við landskassan, er tað sostatt mvg av vinninginum í smásøluliðinum, ið verður goldið.

Søluprísurin til brúkaran vil sambært døminum vera 8,98 kr./ liturin.

**Broytingaruppskot**

**til**

*løgtingsmál nr. 73/1992: Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald.*

Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 við seinni broytingum, um meirvirðisgjald verður í § 2, stk. 3, litra f, skoytt uppí aftaná "Fólkaflutningur":

"Flutningur av akførum við skipum hjá strandferðsluni innanoyggja."

I lagtingslov nr. 136 af 8. september 1992 med senere ændringer om meromsætningsafgift foretages i § 2, stk. 3, litra f, tilføjes efter "Personbefordring":

"Befordring af køretøjer med skibe tilhørende "Strandferðslan" mellem øerne."

# 74. Setan av serlæknum í barnasjúkum við heilsuverk Føroya

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum alt fyri eitt at taka neyðug stig til, at avloysari fyri serlæknum í barnasjúkum verður settur.

**Viðmerkingar:**

Einasti serlækni í barnasjúkum í Føroyum hevur sum kunnugt fingið farloyvið í eitt ár.

Tá hetta farloyvið varð játtað, varð sum skilst, samstundis játtaður avloysari í hesum tíðarskeiði.

Tað, sum nú hevur kløkkað mangan og av góðum grundum skapt ótryggleika millum foreldur og starvsfólk innan heilsuverkið, er, at eftir øllum at døma ætlar

landsstýrið ikki at seta serlækna í barnasjúkum sum avloysara, men harafturímóti ætlar landsstýrið, at aðrir "vanligir" læknar skulu røkja starvið, meðan serlæknin er í farloyvi.

Henda ætlan landsstýrisins er heilt burturvið, tá hugsað verður um, at talan júst er um eina sergrein innan læknavísindina, sum nú brádliga, eftir landsstýrisins "kvalifiseraðu" meting, ikki er tørvur á innan føroyska heilsuverkið.

Serlæknin í barnasjúkum er einasti kvalifiseraði til viðgerð og tilrættaleggjan av røktini hjá prænetalum (ov tíðliga føddum) børnum.

Serlæknin í barnasjúkum hevur kanningina av øllum nýføðingum á LS um hendi.

Serlæknin í barnasjúkum hevur sum yvirlækni ábyrgdina av barnadeildini á landssjúkrahúsinum, har børn úr øllum Føroyum verða innløgd.

Serlæknin í barnasjúkum er knýttur at skúlanum á Trøðni og m.a. samskipar hann tær vitjanir, hesin skúli tvær ferðir um árið, fær av donskum serlæknum, ið skipa fyri kanningum/viðgerðum av teim børnum, sum hava serligan tørv fyri neyðini.

Serlæknin í barnasjúkum virkar annars fyri, at foreldur við sjúkum, brekaðum og kronisk sjúkum børnum fáa ein góðan og tryggan karm um tað, sum hesi foreldur og børn nú hava fyri neyðini.

Bert tann eini serlæknin í barnasjúkum er í Føroyum, men skulu vit samanlíkna okkum við onnur lond - t.d. Ísland, áttu vit at havt ikki færri enn tríggjar her á landi.

Tað er átaluvert, at landsstýrið í samband við givna farloyvi nýtir (misnýtir) møguleikan at "spara" sær nakrar krónir í hesum sambandi. Ein "sparing", sum tíanverri uttan iva kemur aftur um brekku!

Børnini og avvarðandi teirra gerast teir stóru tapararnir, um landsstýrið heldur fast við prioritering sína og ongan avloysara setur fyri serlæknan í barnasjúkum.

Órímiligt er tað eisini móti starvsfólkunum - læknum og røktarstarvsfólki - sum í hesum døgum taka eyka tøk, at fáa álagt uppgávur, sum í roynd og veru bert serlækni í barnasjúkum átti at ábyrgdast av.

Tí er at vóna, at solidaritetur løgtingsins í hesum máli er nærri knýttur at foreldrum og børnum teirra, enn hann er tað ímóti landsstýrinum.

## Álit

### í

*løgtingsmáli nr. 74/1992: Setan av serlækna í barnasjúkum við heilsuverk Føroya.*

Málið er lagt fram av Tordi J. Niclasen, løgtingsmanni, tann 22. desember 1992 og eftir 1. viðgerð 20. januar 1993 beint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur havt fund við landsstýrismannin í heilsumálum og har fingið upplýsing um málið.

Serlæknin í barnasjúkum fekk farloyvi frá 1. desember 1992 og varð í fyrstu syftu ikki eftirlíkað Heilsuverkið Føroya at seta avloysara. Seinni er málið tikið uppaftur, og hevur løgmaður givið loyvi at seta ein avloysara. Heilsuverkið hevur nú søkt eftir avloysara. Hóast ikki nógvir serlæknar í barnasjúkum eru, so roknar sjúkrahússtjórin við, at avloysari verður settur.

Ein samd nevnd metir tí, at málið er avgreitt, og mælir tí frá at samtykkja uppskotið.

# 75. Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.*

*lagtingslov om ændring i lagtingslov om fastsættelse af skat til landskassen.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan við seinni broytingum verður gjørd henda broyting:

§ 1, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"Vísandi til § 54 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður skattur teirra, ið nevnd eru í § 1, nr. 1-6 og § 2, stk. 1, litra d, e og f í somu lóg, til landskassan ásettur soleiðis:

Er inntøkan minni enn 22.500 kr. verður latið 0%"

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 87 af 1. september 1983 om fastsættelse af skat til landskassen med senere ændringer foretages følgende ændring:

§ 1, stk. 1 affattes således:

"Under henvisning til § 54 i lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer udskrives skatter for dem, der er omhandlet i § 1, nr. 1-6 og § 2, stk. 1, litra d, e og f i samme lov, til landskassen således:

Er indtægten mindre end 22.500 kr. erlægges 0%."

| Er iuntøkan | men minni enn | verður latið | av | og av restini |
|---|---|---|---|---|
| Er indtægten | men mindre end | erlægges | af | og af resten |
| **kr.** | **kr.** | **kr.** | **kr.** | **%** |
| 22.500 | 60.000 | 0 | 22.500 | 15% |
| 60.000 | 140.000 | 5.625 | 60.000 | 31% |
| 140.000 | 220.000 | 30.425 | 140.000 | 36% |
| 220.000 | 300.000 | 59.225 | 220.000 | 39% |
| 300.000 | | 90.425 | 300.000 | 43% |

**§ 2.**

Henda løgtingslóg fær gildi 1. januar 1993. Samstundis fer úr gildi § 1, nr. 1 í løgtingslóg nr. 178 frá 18. desember 1992 um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

**§ 2.**

Denne lagtingslov træder i kraft 1. januar 1993. Samtidig ophæves § 1, nr. 1 i lagtingslov nr. 178 af 18. december 1992 om ændring i lagtingslov om fastsættelse af skat til landskassen.

**Viðmerkingar:**

Í løgtingsmáli nr. 36/1992, sum er broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan, er ein villa komin í við tað, at í uppskoti landsstýrisins til broyting nr. 1, sum er ein broyting til § 1, stk. 1 í ásetingarlógini, restar eitt trin í skattastiganum.

Talan er um landsskattaprosentið, sum skal líknast á inntøku frá 220.000 til 300.000 kr.

Í viðmerkingum landsstýrisins til løgtingsmál nr. 35/1992, sum eisini eru viðmerkingar til løgtingsmál nr. 36/1992 og í fylgiskjølunum til málið er skattastigin býttur í 5 trin, meðan tann samtykta og lýsta broytingin í ásetingarlógini bert hevur 4 trin. Hetta er sum sagt ein villa, og má henda rættast, fyri at skattastigin kann nýtast.

Landsstýrið setur tí fram uppskot um at fáa broytt tann samtykta stigan soleiðis, at hesin verður sum nevnt í omanfyristandandi lógarbroyting.

# Broytingaruppskot

## til

*løgtingsmál nr. 75/1992: Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan*

Í løgtingsmáli nr. 36/1992 samtykti løgtingið broytingar viðvíkjandi skatting av partafeløgum. Higartil hevur partafelagsskatturin verið 49% og skattur vinningsbýti 20%, men við løgtingsmáli nr 36/1992 verður partafelagsskatturin minkaður niður í 22% og vinningsbýtið hækka upp í 35%. Tó varð hetta gjørt sum ein undantaksregla, so at bert partafeløg við partapeningi omanfyri 300.000 kr fingu 22% skatt. Hetta førir við sær, at partafeløg við partapeningi miðanfyri 300.000 kr. skuldu gjalda 49% í pf. skatt umframt 35% í vinningsbýti, nú er einfalt eitki eftir. Tað kann ikki verða rætt.

Endamál landsstýrisins við hesi broyting er at sleppa undan teimum sokallaðu 10.000,- króna partafeløgunum. Hetta endamál er í sjálvum sær eitt stig rætta vegin, men tá landsstýrið samstundis boðar frá, at nýggj partafelagslóg kemur í nærmastu framtíð, er ógrundað at koma við hesum í skattalógini, tí hetta hoyrir heima í partafelagslógini.

Tað eru nógv partafeløg, ið hava ein partapening niðanfyri 300.000,- kr., ið ikki eru til spekulatión. T.d. partafeløg, ið eru 20 - 30 ára gomul ella meir hava neyvan ein partapening omanfyri 300.000,- kr., men eru hesi sunn hóast tað.

Við samtyktu broytingunum í skattalógunum verða íløgugrunnar avtiknir og kompenseraðir við at lækka skattin úr 49% niður í 22%. Í hesum føri eru bert tey partafeløg við partapeningi omanfyri 300.000,- kr. kompenserað, tað kann ikki verða rætt.

Núgaldandi rentuskattur hjá partafeløgum upp á 18% verður lagdur um til, at rentan inngongur í raksturin, og skal har skattast sum annar rakstur. So skulu væl koyrandi partafeløg gjalda 22% í rentuskatti. Her verður eisini órættur gjørdur ímóti partafeløgum við partapeningi, sum er minni enn 300.000,- kr., tí hjá teimum verður skatturin av rentum hækkaður úr 18% upp í 49%. Tað kann heldur ikki verða rætt.

Ein undanførsla fyri broytingunum er, at partafeløg kunnu bert hækka sín partapening upp um 300.000 kr., so er trupulleikin loystur. Hetta er lættari sagt enn gjørt, tí peningi er ikki nógv av í landinum, og vit koma heldur ikki uttan um, at vit hava nógvar smáar fyritøkur í landinum.

Men um upphæddin var nakað væl minni, hevði tað verið lættari. Tí verður her skotið upp at lækka hetta mark upp á 300.000 niður í 150.000,-

Undirritaðu eru samdir við landsstýrinum í, at sokallaðu 10.000,- króna partafeløgini verða fingin burtur, men undirritaðu halda, at hetta skal gerast í partafel-

agslógini, sum landsstýrið fer at leggja fyri løgtingið í nærmastu framtíð, har vit hava eina tillagingartíð. Tó er markið upp á 150.000 kr. eitt stig á vegnum.

Samsvarandi hesum seta undirritaðu tingmenn fram soljóðandi:

**Broytingarnppskot**

**til**

**uppskot landsstýrisins**

Undir § 1 verður sett nýtt punkt:

Í § 5, stk. 2 verður "300.000" broytt til "150.000."

I § 1 indsættes som nyt punkt:

I § 5, stk. 2 ændres "300.000" til "150.000."

# 76. Val av álitismonnum og nevndum

**Flogleiðir - Holdingfelagið**

Sbrt. viðtøkunum § 12: løgtingið velur 2 limir í 7- mannanevnd hvørt ár:

| **1991 24/4:** | **1993, / :** |
|---|---|
| **Fastir limir:** | **Fastir limir:** |
| Leivur Johannesen, Tórshavn | 1. |
| Carlo Joensen, Miðvági. | 2. |
| **Tiltakslimir:** | **Tiltakslimir:** |
| Jan Poulsen, Sumba | 1. |
| Jóan Jakku Heinesen, Sørvág | 2. |

**Flogsamband Føroya -**
4 limir í stýrið

Sambært løgtinssamtykt í løgtingsmáli nr. 10/1969: bls. 73, 4 limir hv. ár.

| **1991 24/ 4:** | **1993, / :** |
|---|---|
| Haldur A. Hansen, Tórshavn, | 1. |

Jørgen Niclasen, Sørvágur, 2.
Petur F. Christiansen, Tórshavn 3.
Sigurð Joensen, Tórshavn. 4.

**Flogsamband Føroya**
Umboðsmaður á aðalfundi:
Hvørt ár

**1992/ 3/6:** **1993, / :**
Anfinn Kallsberg, Viðareiði 1.

**Fongslini** 2 eftirlitsmenn við sbrt. § 793 í rættargangslógini fyri 4 ár.

**1989 19/4:** **1993, / :**
Ivan Johannesen, Miðvágur, 1.
Børge B. Hansen, Tórshavn. 2.

**Landsskattanevndin**
Sambært § 96 í lóg nr. 86 frá 1/9 1983:
5+5 limir fyri 4 ár.

**1989 19/4:** **1993 / :**

**Fastir limir:** **Fastir limir:**
Mikkjal á Bergi, 700 Klaksvík 1.
Hergeir Nielsen, 900 Vágur 2.
Olaf á Stongunum, í Brekkuni 9, 100 Tórshavn 3.
Ragnar Samuelsen, 700 Klaksvík 4.
Sofus í Selvindi, 490 Strendur 5.

**Tiltakslimir:** **Tiltakslimir:**
Hanus undir Leitinum, 230 Húsavík 1.
Súni í Hjøllum, 650 Toftir 2.
Eyðun Anthoniussen, 650 Toftir 3.
Kári D. Petersen, advokatur, Álvastígur, 100 Tórshavn 4.
Olivur Joensen, 700 Klaksvík 5.

**Sjóvinnubankan**
- umboðsmaður á aðalfundi
hvørt ár

| **1992 3/6** | **1993 / :** |
|---|---|
| **Umboðsmaður:** | **Umboðsmaður:** |
| Hans Pauli Holm, 800 Tvøroyri. | 1. |
| **Varamaður:** | **Varamaður:** |
| Eliesar Arge, yvirlækni, Gundadalur, Tórsbavn. | 1. |
| **Sjúkrahússtýrislimir:** | |
| **Landssjúkrahúsið:** | |
| **Fastur limur:** | **Fastur limur:** |
| Líggjas Joensen, Tórshavn | 1. |
| **Tiltakslimur:** | **Tiltakslimur:** |
| Dia P. Johannesen, Glyvrar | 2. |
| **Ráðleggingarnevndin fyri sjúkrahúsini:** | |
| Val av limi fyri Líggjas Joensen, Tórshavn. | 1. |

**Skipafelagið Føroyar -**
í nevndina fyri - 2 limir hvørt ár

| **1992 3/6:** | **1993 / :** |
|---|---|
| Martin Joensen, Granagøta 28, 100 Tórshavn. | 1. |
| Álvur Kirke, 180 Kaldbak. | 2. |

**Skipafelagnum Føroyar**
- umboðsmaður á aðalfundi hjá
hvørt ár

| **1992 3/6:** | **1992 / :** |
|---|---|
| **Umboðsmaður:** | **Umboðsmaður:** |
| Dánjal P. Danielsen, 176 Velbastað. | 1. |
| **Varamaður:** | **Varamaður:** |
| Ólavur Heinesen, 520 Leirvík | 1. |

**Vanlukkutryggingarráðið**
- í nevndina fyri - sbrt. lóg
frá 31/3 1931 § 9, 4. hvørt ár

| **1989 19/4:** | **1993 / :** |
|---|---|
| **Fastir limir:** | **Fastir limir:** |
| Helena Samuelsen, Hvítanesvegur 10, 188 Hoyvík. | 1. |
| Hanna Lisberg, Klokkaragøta 26, 100 Tórshavn. | 2. |
| Karsten Hansen, politistur, 700 Klaksvík. | 3. |
| **Tiltakslimir:** | **Tiltakslimir:** |
| Johan Samuelsen, lærari, Tórfinnsgøta 26, 100 Tórshavn. | 1. |
| Sonja Klein, 385 Vatnsoyrar. | 2. |
| Heri Ellingsgaard, 700 Klaksvík. | 3. |

**Yvirprísráðið**

- sbrt. 11. nr. 43 frá 23/6
1978, § 15, 2. stk.: 3 limir, 4. hvørt ár

| **1989 19/4:** | **1993 / :** |
|---|---|
| Dan Nielsen, 800 Tvøroyri. | 1. |
| Dánjal Magnussen, advokatur, Heiðaskákið 10, 100 Tórshavn. | 2. |
| Sigrid Dalsgaard, 188 Hoyvík. | 3. |

# 77. Løgtingslóg um avskriving av restskuld av lánum, sum Húsalánsgrunnurin hevur úr Oljugrunninum

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um avskriving av restskuld av lánum, sum Húsalánsgrunnurin hevur úr Oljugrunninum.*

**§ 1.**

Restskuldin av teimum lánum, sum Húsalánsgrunnurin hevur fingið veitt úr Oljugrunninum sambært løgtingslóg nr. 99 frá 1. oktober 1986, um serligt gjald á brenniolju v.m. við seinni broytingum j.br. løgtingslóg nr. 33 frá 27. mars 1992, um avtøku av landskassagrunnum, verður avskrivað.

**§ 2.**

Henda lóg fær gildi 1. februar 1993.

*lagtingslov om afskrivning af restgæld af lån, som Boligfonden har fået af Oliefonden.*

**§ 1.**

Restgælden af de lån, som Boligfonden har fået af Oliefonden i henhold til lagtingslov nr. 99 fra 1. oktober 1986, om særlig afgift på brændselsolie m.v. med senere ændringer j.fr. lagtingslov nr. 33 fra 27. marts 1992, om ophævelse af landskassefonde, bliver afskrevet.

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft 1. februar 1993.

**Viðmerkingar:**

Landsstýrið samtykti, tann 8. september 1992 at hækka rentuna av teimum rentustuðlaðu útlánunum hjá Húsalánsgrunninum úr 8% til 9,75% p.a. og at hækka rentuna av ískoytislánunum úr 10% til 11% p.a. Rentuhækkingin kom í gildi 1. november 1992. Afturgjaldstíðin fyri øll lán var óbroytt.

Grundgevingin tá fyri at hækka rentuna var, at játtanin til Húsalánsgrunnin á fíggjarlógini var minkað munandi:

| Ár | Játtan (kr. 1.000) |
|---|---|
| 1988 | 27.000 |
| 1989 | 40.000 |
| 1990 | 32.000 |
| 1991 | 0 |
| 1992 | 5.000 |
| 1993 | 5.000 |

Avleiðingarnir av hesum hava verið, at grunnurin hevur havt trupult við at fáa fíggjarliga javnvág millum upptøku av lánum og útlánum. Somuleiðis minkaði eginognin úr 47% í 1989 og til 42% í 1991. Í 1992 var eginogn grunnsins 38%. Samanumtikið hevði hetta havt við sær, at kredittvirðið hjá grunninum versnaði soleiðis, at vandi var fyri, at inn- og útlendsku lángevararnir í framtíðini ikki vildu veita tey neyðugu lánini til grunnin. Tí samtykti landsstýrið at hækka útlánsrentuna.

Fyri húsaeigarar merkti avgerð landsstýrisins øktar lániútreiðslur, millum kr. 300-900 um mánaðin, sambært útrokningum hjá Húsalánsgrunninum.

Sæð í mun til tey búskapartiltøk, sum longu eru sett í verk, t.d. eykaskattur, rentuskattur, lønarlækkingar, stovnan av A-trygging, arbeiðsmarknaðareftirlønargjald, MVG-lóg, lækking av rentufrádráttinum úr 42% til 40%, vil hetta tyngja munandi um gjaldevnini hjá húsaeigarum, serliga í 1993. Vandi er tí fyri, at nógv húski, sum í dag hava trupult við at gjalda rentur og avdráttir og annars at klára aðrar neyðugar húsarhaldsútreiðslur, kunna missa húsini. Harumframt eru tíverri nógv, sum hava sett búgv, vorðin arbeiðsleys.

Upprunaliga endamál grunnsins er at vera við til at stuðla við lagaligum lánum teimum, sum seta búgv. Eftir broytingunum í november 1992, hevur verið trupult hjá grunninum at liva upp til endamál sítt.

Landsstýrið hevur síðan havt rentustøðið hjá Húsalánsgrunninum til nýggja viðgerð, og leggur fyri tingið fylgjandi uppskot til løgtingslóg um avskrivingar av restskuld grunnsins í Oljugrunninum.

**Restskuldin er:**

* Lánið úr Oljugrunninum, nr. 1 kr. 16.000.000 verður strikað.
* Lánið úr Oljugrunninum, nr. 2 kr. 16.000.000 verður strikað.
* Lánið úr Oljugrunninum, nr. 3 kr. 25.500.000 verður strikað.

Tilsamans kr. 57.500.000

Henda avskriving skapar møguleika fyri fylgjandi rentulækkingum:

* øll veitt vanlig útlán verða sett til 8,5% p.a.
* øll veitt ískoytislán verða sett til 10,5% p.a.

** Vanlig útlán til keyp av sethúsum framyvir verður 8,5% p.a.
** Ískoytislán til keyp av sethúsum framyvir verður 10,5% p.a.

*** Vanlig útlán til nýggj sethús framyvir verður 9,75% p.a.
*** Ískoytislán til nýggj sethús framyvir verður 11% p.a.

Eginognin fyri 1993 vil við hesum lækka 2-4%.

Tá er hædd tikin fyri avseting móti tapi fyri 1993.

Solciðis, sum búskaparstøðan er í samfelagnum í dag, verða neyvan nógv nýggj hús bygd í 1993, og spurningurin er um Húsalánsgrunnurin skal vera við til at stuðla hesum í størri mun. Hetta kann grundast á tær økjandi áheitanirnar um tvingsilssølur, samstundis sum grunnurin er vitandi um, at nógv hús standa tóm ella eru til sølu. Í hesum sambandi er ætlanin at gera eina kanning av, hvussu stórur húsakapasitetur er til taks kring landið, og hvussu stórur tørvur er á nýbygging á teimum ymisku støðunum.

Húsalánsgrunnurin hevur tí mett, at framyvir eigur grunnurin at gera møguleikarnar at fíggja keyp/sølu av verandi húsum lagaligari og innanfyri ein keypspris/metingarupphædd, sum skal góðkennast av grunninum. Hetta skal m.a. gerast við at broyta ásetingarnar um húsastøddir í kunngerðini um Húsalánsgrunnin.

Hetta hevði havt við sær eina positiva ávirkan á virðið av verandi setahúsahópi.

Um grunnurin fer meira inn í eina slíka fíggingarskipan, kann tað mangan verða talan um hús, har støddin fer upp um ásetingarnar í lógini. Spurningurin er tí, um gerast skal ein fyribilslóg ella ein kunngerð, ið gongur hesum á møti. Hesum spurningi verður arbeitt við í løtuni.

Kortini verður mett, at tá eginpeningur er tilstaðar, og útboð av húsum annars ikki er á staðnum, so kann ein vanlig fígging fara fram.

Um rentu grunnsins er at siga, at skal hon niður aftur, sum skotið er upp, er somuleiðis neyðugt, at grunnurin fær í láni uml. 70 mió. kr. í 1993, harav skula 60 mió. kr. nýtast til nýútlán.

Tey tryggjaðu lánini, t.e. lán, sum landskassin veðheldur fyri, falla til gjaldingar, um eginognin fer niður um 33%, umframt at aðrir lánistovnar ivaleyst gera vart við seg. Annars hevur grunnurin stórar avsetingar móti tapi í fíggjarætlanunum fyri 1992, 1993 og 1994. Tap grunnsins vóru í 1991 2,7 mió. kr og í 1992 5-6 mió. kr. Í fíggjarárinum 1993 og framyvir verður neyðugt at seta munandi upphæddir av móti tapi.

Tað er landsstýrisins vón, at henda ætlaða rentulækkingin hjá Húsalánsgrunninum, kann ávirka peningastovnarnar til eisini at lækka útlánsrentuna.

# Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 77/1992: Løgtingslóg um avskriving av restskuld av lánum, sum Húsalánsgrunnurin hevur úr Oljugrunninum.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 14. januar 1993 og eftir 1. viðgerð 21. januar 1993 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur havt fundir við stjóran fyri Húsalánsgrunnin Jóannes Dalsgarð um fíggjarligu støðuna hjá grunninum og við Jógvan Sundstein, landsstýrismann í fíggjarmálum.

Jóannes Dalsgarð greiddi frá fíggjarligu viðurskiftunum, sum serliga eru ávirkað av, at játtanimar á fíggjarlógini hava verið fallandi frá 1989, tá 40 mió. kr., til nú 1991 0 kr., 1992 5 mió. kr. og 5 mió. kr. 1993. Avleiðingarnar av hesum hava verið, at torført hevur verið at fingið fíggjarliga javnvág millum upptøku av lánum og útlánum. Eginognin fall úr 47% í 1989 til 42% í 1991. Í 1992 var eginognin 38%. Í viðmerkingum landsstýrisins verður gjørt vart við, at landsstýrið hevur viðgjørt rentustøðið hjá Húsalánsgrunninum og tilskilar, at um fyriliggjandi uppskot um avskriving av restskuld grunnsins kr. 57,5 mió. í Oljugrunninum skapar møguleikar fyri rentulækkingum, sum eru settar upp í viðmerkingum landsstýrisins til fyriliggjandi mál, kann eginognin fyri 1993 lækka 2-4%.

Jógvan Sundstein, landsstýrismaður, greiddi frá á fundi í fíggjarnevndini viðvíkjandi Oljugrunninum, sum er avtikin fyri einum ári síðani og hvørs ognir eru falnar til landskassan.

Ein meiriluti er av teirri áskoðan, at tað er umráðandi at varðveita eginpeningsstøðið í Húsalánsgrunninum, og mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein minniluti (Asbjørn Joensen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins, men ger vart við, at hóast allur bati bøtur, tá er hetta tiltak fyri onki at rokna.

Tað at lætta um lánibyrðuna hjá grunninum við um 60 mió. kr. afturfyri ein stuttan lætta í rentugjaldinum hjá lántakarunum hevur onga meining.

So sum støðan er í dag, og tá hugsað verður um tey mongu, ið hava lán úr grunninum, til byggjan av meiningsleyst kostnaðarmiklum húsum, og sum nú standa í boði at liva av 4-5000 kr. um mánaðin er meiningsleyst.

Um vit vilja tað ella ikki, tað er neyðugt at skipa fyri tiltøkum, sum muna, og tá er hetta uppskot landsstýrisins ongin loysn.

Mælt verður tí til at gera munandi tiltøk fyri tey illa fyrikomnu við at sanera stóran part burtur av skuldbyrðu teirra.

Tað er tá eingin orsøk til, at bert oljugrunnurin skal verða umhugsaður, so sum gjørt verður.

Føroysku grunnarnir eiga góðar 200 mió. kr. hjá Húsalánsgrunninum, t.v.s. hjá hesum ungu, sum nú eru komin í neyðstøðu, og hesir grunnar eiga eisini at verða við í tiltakinum at hjálpa. Best um øll henda skuldin verður strikað.

Verður so hugsað um prioritetsstøðu bankanna, tá er tað eingin loyna, at hesir hava notið meira enn gott av byggiskipanini, so samráðingar her kunnu bert enda við góðum úrsliti. Møguligt er hesin 3. ella 4. prioritetur longu saneraður burtur fyri tann partin, ið viðkemur Sjóvinnubankanum, um so er, at hesin enn einaferð skuldskrivar tí unga ella lántakaranum.

Restskuld grunnsins frá uttanlandslánum um 250 mió. kr. kundi verið tosað um við frammanfyri standandi prioritetir við yvirtøku av restognini fyri eyga.

Tað eigur at verða umhugsað av álvara, um vit í verandi støðu veruliga hava tørv á hesum mongu byggiprioritetum, ið mega bera stóran part av skuldini fyri meiningsleysa byggikostnaðin.

Kundu vit loyst hesa uppgávu ella bert part av henni, tá gjørdust tíðirnar minni daprar fyri ungfólk okkara, og er tiltakið tá ein veruligur bati í neyðini.

## Uppskot

## til

## samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at taka upp samráðingar við lánsistovnar við atliti at samskipa prioritetirnar og lætta um lánibyrðuna.

# 78. Broyting í løgtingslóg nr. 32 um minstuløn, dagstudning og minstaforvinning frá 27. mars 1992 við broyting í løgtingslóg nr. 159 frá 16. november 1992

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 32, um minstuløn, dagstudning og minstaforvinning frá 27. mars 1992 við broyting í løgtingslóg nr. 159 frá 16. november 1992.*

*lagtingslov om ændring af lagtingslov nr. 32 om mindsteløn, dagstøtte og mindsteindtægt af 27. marts 1992 med ændring i lagtingslov nr. 159 af 16. november 1992.*

**§ 1.**

§ 6, 1) verður soljóðandi:

1) Fyri trolarar á feskfiskaveiðu, saltfiskiskip á línuveiðu, frystiskip á hemara- og svartkalvaveiðu v.m., verksmiðjutrolarar á svartkjaftaveiðu, nótaskip, íðnaðartrolarar, verksmiðjutrolarar, sum salta ella frysta veiðuna umborð, frystiskip á rækju- ella skeljaveiðu og skip á laksaveiðu verður við núverandi minstuløn veitt hvørjum manni eyka fyri hvønn mynstraðan dag á túrinum tað, sum er munurin millum 8 vanligar tímalønir í sáttmálanum millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag og 1/30 part av mánaðarminstulønini. Henda viðbót verður lækkað

**§ 1.**

§ 6, 1) ændres sålydende.

1) For trawlere på fiskeri efter ferskfisk, saltfiskeskib på linefiskeri, fryseskib på fiskeri efter sildehaj eller hellefisk m.m., fabrikstrawlere på fiskeri efter sortmund, ringnotskib, industritrawlere, fabrikstrawlere, som nedsalter eller fryser fangsten ombord, fryseskib på fiskeri efter rejer eller muslinger og skib på fiskeri efter laks ydes med nuværende mindsteløn hver mand ekstra for hver påmønstret dag på turen det, som er forskellen mellem 8 almindelige timelønninger i overenskomsten mellem Føroya Arbeiðararfelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag og 1/30 del af måneds-

45 oyru fyri hvørja krónu, sum fiskipartur, íroknaður minstuløn og manningarstudning fyri hvønn dagin, fer upp um 1/30 av galdandi mánaðar minstuløn.

mindstelønnen. Dette tillæg reduceres med 45 ører for hver krone, som fangstandel, incl. mindsteløn og mandskabsstøtte pr. dag, overstiger 1/30 af gældende måneds mindsteløn.

§ 2.

Hendan lóg fær gildi 1. januar 1993.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1993.

**Viðmerkingar:**

Sambært uppskoti um játtan til fiskivinnuna á § 16 í uppskotinum til løgtingsfíggjarlóg fyri 1993 er treytin, at skerjingin av dagstudningi verður broytt úr 40 oyrum í 45 oyru.

## Álit

í

*løgtingsmáli nr. 78/1992: Broyting í løgtingslóg nr. 32 um minstuløn, dagstudning og minstaforvinning frá 27. mars 1992 við broyting í løgtingslóg nr. 159 frá 16. november 1992.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 14. januar 1993 og eftir 1. viðgerð 21. januar 1993 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini fingið skriv frá Føroya Fiskimannafelag viðvíkjandi minstuløn til manningar á partrolarum, tá tríggjar manningar eru við tveimum partrolarum, og býtt verður til allar. Felagið ynskir, at eisini veitingar frá lønjavningargrunninum, sum t.d. minstaløn verður býtt á sama hátt. Nevndin heldur, at tað eigur at verða kannað, um møguleikar eru fyri hesum, og arbeitt verður tí víðari við málinum.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Henrik Old, Jógvan A. Johannessen, Anfinn Kallsberg og Olaf Olsen) vísir á, at í uppskoti landsstýrisins verður skotið upp, at lógin fær gildi frá 1. januar 1993. Meirilutin heldur ikki, tað er rætt, at lógin verður sett í gildi afturvirkandi og mælir til, at lógin fær gildi dagin eftir, hon er kunngjørd, og setir tí fram broytingaruppskot hesum viðvíkjandi. Meirilutin mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins við nevndu broyting og setir samsvarandi hesum fram soljóðandi:

**broytingaruppskot**

**til**

**uppskot landsstýrisins**

| | |
|---|---|
| § 2 verður soljóðandi:<br>"Henda lóg fær gildi dagin eftir, hon er kunngjørd." | § 2 formuleres således:<br>"Denne lov træder i kraft dagen efter, den er bekendtgjort." |

Minnilutin (Jógvan Ingvard Olsen og Terje Davidsen) tekur ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Heini O. Heinesen) tekur ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

# 79. Handilssáttmálar við Finnland, Ísland, Noreg og Svøríki

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið góðkennir hjáløgdu sáttmálar ímillum ríkisstjórn Danmarkar og Føroya Landsstýri øðrumegin og ávíkavist Finnland, Ísland, Noreg og Svøríki hinumegin.

**Viðmerkingar:**

Landsstýrið hevur sett sær fyri, at Føroyar skulu finna sítt natúrliga pláss í tí europeiska samstarvinum. Serliga er um at røða skipanin av innara marknaðinum millum tey 12 limalondini í EF frá 1. januar og skipanin av EBS, Europeiska Búskaparliga Samstarvinum, sum skuldi verið skipað 1. januar, men verður nakað seinkað. Ein týðandi partur av hesum er at fáa greiðar avtalur um handilsviðurskifti, so føroyskar vørur hava frítt at fara uttan tollforðingar um landamark. Umframt hetta kannar landsstýrið samstarv á øðrum økjum. Sáttmálarnir við tey seinastu EFTA londini, Eysturríki, Schweitz eru komin væl á leið og kunnu væntandi undirskrivast skjótt og síðani leggjast fyri løgtingið.

Grundin fyri at gera sáttmálarnar nú er at nevna, at Føroyar í handilssáttmálanum við EF hava bundið seg til at áleggja vørur við uppruna í triðjalondum serligan GATT-toll.

Heimild er tó fyri at taka av tollin á vørum við uppruna í teimum triðjalondum, sum Føroyar gera sáttmála við um frihandil.

Landsstýrið avgjørdi í januar 1992 at fara undir frihandilssamráðingar við EFTA-lond. Tað var tá hildið at vera rættast at samráðast við hvørt EFTA-landið sær, heldur enn við EFTA sum eind. Undir øllum umstøðum eru sáttmálarnir við EFTA-lond altíð beinleiðis millum lond, hóast sjálvur sáttunálateksturin í høvuðsheitum er komin fram undir felags samráðingum. Uttanríkisráðið hevur skipað fyri samráðingunum og sendinevndarleiðari hevur verið ein skrivstovustjóri í uttanríkisráðnum.

Undan hesum samráðingum vóru bert sáttmálaskipað viðurskifti fingin í lag við Finnland, í einum stuttum sáttmála, har partarnir lova hvørjum øðrum ikki at gera mun á vørum við uppruna hjá hinum partinum og vørum við uppruna í EF. Við hini norðurlondini hava verið óformligar avtalur, sum skuldu tryggja, at tollgarðar, sum vóru horvnir við EFTA-sáttmálanum, ikki komu afturíaftur. Fyribils eru sáttmálarnir við Finnland, Ísland, Noreg, og Svøríki undirskrivaðir. Undirskrivaðu sáttmálarnir eru lagdir hjá sum skjøl. Sáttmálarnir sjálvir fevna ikki um veruligar landbúnaðarvørur, mest tí EFTA samstarvið ikki fevnir um frihandil við landbúnaðarvørum. Avtala um sømdir á landbúnaðarvørunum eru gjørdar í brævaskifti millum sendinevndarleiðaramar, sum eru løgd til sáttmálarnar. Hóast løgtingið ikki hevur góðkent sáttmálarnar enn, hevur verið arbeitt eftir sáttmálunum við Ísland og Noreg síðani 1. september 1992 smb. § 29 í sáttmálunum við hesi lond.

Longu 1. januar setti landsstýrið fyribils tollreglur á ávísar innflutningsvørur, tí ynskiligt var, at grundarlagið undir vanligu handilsstreymum og -sambondum við grannalond okkara ikki varð broytt, meðan samráðingar vóru um skipað viðurskifti.

Tað eigur at verða gjørt greitt, at handilssáttmálar - ynski um handilssamstarv við onnur lond - seta krøv til sáttmálapartarnar um - at kappingin millum sáttmálapartarnar veruliga er frí og ikki verður tarnað við tekniskum forðingum ella avlagandi viðurskiftum, sum t.d. statsstuðli og øðrum.

**Føroysk ynski í samband við samráðingarnar**

Føroyska samráðingarnevndin setti sær fyri undan samráðingunum at smíða sáttmálarnar við EFTA-lond eftir sama leisti sum sáttmálan við EF. Sambært hesum sáttmála hevur EF fullan frihandil við ídnaðar- og fiska-, og landbúnaðarvørum (tó mjólk og lambskjøt undantikin). Afturfyri fingu vit fullan frihandil við teim landbúnaðarvørum, sum hava áhuga Føroya, ídnaðarvørum og fiskavørum,

tó vóru tollkvotur og tollloft ásett fyri føroyskan útflutning til EF-marknaðin, tá talan var um fiskasløg, sum EF metti viðkvom.

Millum onnur ynski hjá donsk/føroysku samráðingarnevndini eru serliga at nevna føroyskur kumuleringsrættur við EFTA (t.e. at tá ið føroyingar útflyta vørur við EFTA-uppruna, skulu tær verða javnmettar við vørur við uppruna í Føroyum), og fult tollfrælsi fyri fiskavørur (tvs. ongar kvotur og ongi loft). Ístaðin fyri regluna í sáttmálanum við EF um at fiskavørur skulu hava fullan uppruna, var skotið upp at nýta eina 50% reglu. Harafturat var skotið upp, at hvør parturin kann ikki nýta strangari útflutningstarnandi reglu enn tær, parturin nýtir mótvegis EF.

Við hesi orðingini var ætlanin at tryggja, at føroysk virki ikki standa seg verri enn virki í EF, tá EFTA-bátar (og tá serliga íslendskir) landa í útlandinum. Hinvegin gevur orðingin møguleika fyri, at føroyingar hava reglur, sum tarna útflutningi av óvirkaðum fiski úr Føroyum, bert reglurnar ikki gera mun á útflutningi til EF og útflutningi til EFTA.

## Ynski hjá Norðurlondum í EFTA

EFTA-londini ynsktu, at sáttmálarnir skuldu verða teimum sáttmálum meira líkir, sum EFTA-londini í løtuni eru í ferð við at gera við triðjalond (t.d. Turkaland, Tjekkoslovakia og Baltisku londini). Føroyska samráðingarnevndin gekk við til hetta, tí í høvuðsheitum er tað bert formurin, sum skilir hesar sáttmálar frá sáttmálanum við EF. Formurin tyktist eisini at vera skilligari og betur uppsettur. Í hesum sáttmálum eru tó - sammett við EF - sáttmálan - ásettar reglur um almennan einkarrætt, um vernd av ognarrættindum hugverka og um almenn innkeyp.

## Semjur

Samanfatað gingu EFTA-londini øllum týdningarmiklu føroysku ynskjunum á møti. Føroyingar fáa sambært sáttmálunum:

1. Fullan frihandil fyri fisk við týdningarleysum undantøkum (finnar og sviar kunnu t.d. til 31. desember 1993 halda nøgdaravmarkingar fyri innflutningi av síld og sflum).
2. Kumuleringsrætt við EFTA
3. 50% upprunareglu fyri allar meirviðgjørdar fiskavørur (kap. 16 í tollskránni). Fyri fiskavørur í 3. kapitli varð hetta ynski ikki gingið á møti.

Tey 4 norðurlondini í EFTA - Ísland undantikið - hildu fast um, at sáttmálin skuldi áseta treytað forboð ímóti útflutningstarnandi reglum, tó skuldi undantak vera í teimum førum, har frír handil gjørdi, at eini vinnugrein stórliga fer at vanta rávøru til virkingar ("serious shortage").

Íslendingar gingu føroyska ynskinum á møti um, at útflutningstarnandi reglur ikki mugu gera mun á útflutningi til EF og útflutningi til Føroya. Landsstýrið legði dent, at sáttmálin skuldi gera tað møguligt hjá føroyingum at kappast um íslendska fiskin, sum fer til Europa. Íslendingar settu tó ta treyt, at so leingi føroyski stuðulin til fiskivinnuna ikki er sambærligur við innanhýsis EFTA-reglurnar á økinum - t.e. kann sigast at vera kappingaravlagandi - kunnu íslendingar seta í verk tiltøk, sum tó ikki mugu ganga víðari enn neyðugt er fyri at byrgja upp fyri møguligum kappingaravlagandi árini frá føroyska stuðlinum.

Íslendingar fingu, sambært brævaskiftinum um landbúnaðarvørur, sum er hjálagt, loyvi til tollfrítt at útflyta eina ávísa nøgd av íslendskum lambskjøti til Føroya, umleið somu nøgd í miðal, sum hevur verið útflutt seinastu árini.

Sum nevnt omanfyri, eru treytir um statsstuðul í sáttmálanum. EFTA-londini og Føroyar binda seg til at taka kappingaravlagandi stuðul til vinnulívið av í seinasta lagi 31. desember 1994, so at samsvar verður við innanhýsis EFTA-reglurnar á økinum. Sama kravið liggur í veruleikanum longu í handilssáttmálanum við EF, sum løgtingið góðkendi í 1991, men uttan nakra tíðarfreist.

Landsstýrið hevur ta áskoðan, at tað má vera í tráð við føroysk áhugamál, at føroysk fiskivinna hevur møguleika at kappast á jøvnum føti við fiskivinnuna í øðrum londum á einum marknað, har føroyskar vørur hava frítt at fara. Um so er, at kappingaravlagandi stuðul verður nýttur, er einasta úrslitið, at føroyski landskassin skal kappast við statskassarnar í øðrum londum, og teir eru allir størri og ríkari enn landskassin.

Almennur stuðul kann framvegis verða latin, bert hann ikki er kappingaravlagandi til t.d.:

1) gransking og kanningararbeiði,
2) at minka um ovkapasitet í eini vinnugrein,
3) sum regionalstuðul til øki, sum liggja illa fyri, tó ikki meira enn neyðugt er, fyri at byrgja upp fyri vansanum av fjarstøðuni,
4) sum almennar tænastur, treytað av, at ongin vinnugrein verður tikin framum,
5) arbeiðsskapandi tiltøk,
6) umhvørvisvernd, og
7) stuðul til smá virki, tó ikki meir enn neyðugt fyri at byrgja upp fyri vansanum av lítlu støddini.

Umframt hesi undantøk verður sosialur stuðul, t.d. stuðul, sum hevur til endamáls at tryggja eina ávísa minstuinntøku, eisini loyvdur. Tað er sostatt í høvuðsheitum tann generelli og áhaldandi stuðulin, sum er bannaður sambært EFTA-reglunum.

Út frá hesum er landsstýrisins meting tann, at tær stuðulslógir, sum eru galdandi í dag, og tær umleggingar, sum ætlanin er at seta í verk, ikki stríða í móti hesum sáttmálum.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 79/1992: Handilssáttmálar við Finnland, Ísland, Noreg og Svørlki.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 14. januar 1993 og eftir 1. viðgerð tann 4. februar 1993 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hava nakrir verið og greitt frá málinum. Kjartan Kristiansen, menningarstjóri, og Jóannes Madsen, fulltrúi, hava greitt frá og sagt, at allir fýra sáttmálarnir eru eins við smáum frávikum. Eisini hava Óli Jacobsen, formaður Føroya Fiskimannafelags, og Ingeborg Winther, formaður Føroya Arbeiðarafelags, verið á fundi, har tey serliga hava greitt frá, at sambært sáttmálarnar verður torført at stuðla arbeiðsskapandi tiltøkum innan fiskivinnuna, tí tey halda, at tað stríðir í móti EFTA sáttmálunum. Eisini verður sagt, at hetta eru avmarkingar í okkara sjálvræði, og at uppskotið beinleiðis villeiðir tingið. Tey mótamæla harðliga, at sáttmálarnir verða samtyktir, og í øðrum lagi mæla tey til, at nýggjar samráðingar verða tiknar upp.

Jóannes Madsen hevur greitt nevndini frá, at spurningurin er umrøddur í grein 16 í EFTA sáttmálunum, sum vísir til eitt fylgiskjal "um tulking av grein 16". Har stendur, at "vanligur stuðul til at skapa nýggj arbeiðspláss, treytað at avtalan ikki er um nýggj arbeiðspláss í vinnugreinum, sum longu líða undir ovorku" er í samsvar við grein 16. Hetta er sambært pkt. 2 ikki galdandi fyri stuðul til fiskivinnuna.

Tað verður við hesum tó ikki sagt, at allur stuðul til at skapa nýggj arbeiðspláss í fiskivinnuni er bannaður. Serliga skal verða lagt til merkis, at forboð bert er fyri vanligum stuðli. Tað kann eftir hesum ikki haldast, at reglan setir forboð fyri stuðli, sum verður veittur einstøkum ætlanum, sum avvarandi myndugleiki eftir umsókn hevur viðgjørt í hvørjum einstøkum føri. Serliga kann nevnast, at stuðulin, sum nú verður veittur til innkeyp av fiski, lýkur hesa treyt, og kann tí ikki haldast at vera umfataður av forboðnum í pkt. 2.

Spumingurin er síðan, um stuðul til at skapa nýggj arbeiðspláss í fiskivinnuni, sum lýkur treytunum omanfyri, stríðir í móti øðrum reglum í fylgiskjalinum. Eftir høvuðsregluni, nevnd í pkt. 1 (a) í fylgiskjalinum, er almennur stuðul at rokna sum studningur, skattalætti ella líknandi, sum førir við sær ein nettopeningaflutning frá almennum keldum til móttakara. Tó er sambært pkt. 1 (c), (i)

og (ii) loyvt at stuðla gransking, menning og nýskapan og vinnugreinir, sum hava trupulleikar av ovorku. Stuðulin til innkeyp av fiski kann metast at vera umfataður av báðum hesum undantøkum, eftir sum hetta er ein nýggj verkætlan, sum ikki hevur verið roynd áður, og stuðulin minkar um trýstið á grunnarnar.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og tríggjar minnilutar.

Meirilutin (Olaf Olsen, Eyðun Viderø, Heini Johansen og Henrik Old) tekur undir við landsstýrisuppskotinum og mælir tinginum til at samtykkja tað.

Minnilutin (Edmund Joensen) vísir á, at Føroyar hava gjørt eina vánaliga handilsavtalu við EF. Hesari avtalu tók Sambandsflokkurin ikki undir við.

Fakfeløg hava víst á nógvar vansar við avtalunum, sum nú fyriliggja við EFTA-londini.

Hóast hesar vansar heldur minnilutin, at EF-sáttmálin ger, at nú slepst ikki undan at hava sáttmálar við EFTA-londini og tekur tí undir við sáttmálanum.

Minnilutin (Hergeir Nielsen) tekur undir við, at Føroyar hava handilssáttmálar við EFTA-londini, men kann ikki taka undir við fyriliggjandi uppskoti.

Tað má sigast at vera heilt stórt spell, at landsstýrið ikki regluliga hevur kunnað løgtingið, vinnulívið og fakfeløgini undir samráðingunum av hesum sáttmála, og eru tey ivamál, sum fram eru komin undir fyrstu viðgerð, ikki svarað nøktandi.

Eftir sáttmálanum er heimilað, at veita stuðul til nýggj arbeiðspláss (general aid), sum t.d. viðgerð av frystum fiski, men hesin stuðul heldur uppat, so skjótt sum mótparturin heldur, at nú er ikki talan longur um eina nýggja framleiðslu. Somu viðurskifti gera seg galdandi viðvíkjandi møguligum øðrum nýggjum framleiðsluhættum.

Hetta er eitt vandamál sæð frá føroyskari síðu við atliti at støðuni á arbeiðsmarknaðinum, og er tað heldur torført at skilja, hví landsstýrið í heila tikið er gingið við til at blanda innanhýsis føroysk viðurskifti so sum inntøkutrygdina hjá fiskimonnum upp í treytirnar fyri føroyskum handilssáttmálum við onnur lond.

Vísandi annars til sjónarmiðini, sum fram vóru førd av Tjóðveldisflokkinum undir fyrstu viðgerð av hesum máli, og til, at neyðugt er at hava handilssáttmálar við EFTA-londini verður tí mælt landsstýrinum til at taka upp nýggjar samráðingar við neyvari kunning mótvegis løgtingi og arbeiðsmarknaði.

Minnilutin (Helena Dam á Neystabø) ásannar, at Føroyar mugu hava handilsavtalur við EFTA-lond eins væl og við onnur lond og aðrar marknaðir, og at Føroyar mugu ganga undir ávísar treytir til tess at tryggja sær rímilig marknaðarvirðurskifti úti í heimi. Men minnilutin átalar, at hvørki løgting ella marknaðarnevnd hevur verið kunnað um gongdina í samráðingunum við EFTA-londini og hevur Føroya løgting tí ongan møguleika havt at ávirka hvørki samráðingargrundarlag ella samráðingarúrslit.

Hesar tingingar áttu ikki bert at snúð seg um tollsømdir, men eisini um sjálvsagdan rætt hjá lítlari tjóð at menna seg búskaparliga og mentanarliga á egnum støði. Til tess er m.a. neyðugt at tryggja, at javnvág er í handilssamstarvinum við tey lond, ið Føroyar gera handilssáttmála við. Einki bendir á, at hesir sáttmálar hava tikið tílíkt fyrilit.

Avleiðingin av at skerja møguleikarnar at menna egið vinnulív, samstundis sum flestu handilsforðingar verða tiknar burtur, kunnu verða sera álvarsamar. Men marknaðarnevndin er ikki kunnað um tílíkar konsekvensmetingar, og kann minnilutin tí bert koma til ta niðurstøðu, at tær eru ikki gjørdar.

Grundað á hesar viðmerkingar kann Sjálvstýrisflokkurin ikki taka undir við sáttmálunum um fríhandil millum Føroyar øðrumegin og EFTA londini hinumegin, soleiðis sum teir fyriliggja nú, men mælir til, at samráðingarnar verða tiknar uppaftur á einum betri og tryggari grundarlagi, og at løgtingið og løgtingsins marknaðarnevnd verða til fulnar kunnað um samráðingargongdina.

Minnilutarnir (Hergeir Nielsen og Helena Dam á Neystabø) seta tí fram soljóðandi:

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at taka upp nýggjar samráðingar við EFTA-londini um handilssáttmálar og at kunna løgtingið um samráðingargongdina.

# 80. Yvirtøka av ráevnunum í undirgrundini

**Uppskot**

**til**

**samtyktar,**

Løgtingið góðkennir viðløgdu avtalu frá 22. desember 1992 millum donsku ríkisstjórnina og Føroya Landsstýri um yvirtøku sum sermál av málsøkinum á lista B í heimastýrislógini: Ráevnini í undirgrundini.

**Viðmerkingar:**

Tingið samtykti longu í 1948, at samráðingar skuldu fara fram við danska ríkisstýrið um yvirtøku av ráevnunum í undirgrundini.

Í 1975 (løgtingsmál nr. 3/1974) samtykti løgtingið aftur, at málsøkið skuldi yvirtakast sum sermál.

Hóast hesar løgtingssamtyktir rukku samráðingar í árunum frá 1975 til 1981 lítið á leið, tí tásitandi stjørn metti hetta at ganga ríkiseindini ov nær, (sí frágreiðing niðanfyri).

Í 1981 valdi løgtingið eina 3-mannanevnd at umboða Føroyar í samráðingum við ríkisstýrið, og vórðu fundirnir hildnir í 1981 og 1982 við ríkisstýrið. Samráðingarnar endaðu úrslitaleysar, orsakað av, at umboðini fyri føroysku og donsku myndugleikarnar ikki kundu semjast um samráðingargrundarlagið.

Frá føroyskari síðu varð hildið fast um løgtingssamtyktina frá 1975, meðan ríkisstýrið hevði ta støðu, at "en fuldstændig og uigenkaldelig overdragelse af statens højesteret over undergrunden til en enkelt del af riget eller til dennes befolkning eller til en hjemmestyremyndighed, efter danske retsprincipper ikke er mulig, og det vil ikke være foreneligt med rigsfællesskabet, at overdrage den fastboende befolkning på Færøerne eneretten til råstofferne i undergrunden".

Í 1986 vóru aftur fundir við ríkisstjórnina um yvirtøkumálið, aftan á at løgfrøðingar høvdu kannað, um løgfrøðisligar forðingar vóru fyri eini yvirtøku. Henda nevndin kom í áliti sínum til tað úrslit, at so var ikki.

Heldur ikki á hesum fundinum spurdist nakað úrslit burturúr.

Landsstýrið setti síðani eina nýggja nevnd at kanna málið, m.a. um tað vóru onnur viðurskifti, enn tey í álitinum frá fyrru undirgrundarnevndini framførdu, sum talaðu fyri, at heimastýrið kundi yvirtaka málsøkið.

Aftaná, at henda nevndin hevði framlagt sítt álit í juli 1988, vóru fundir aftur við ríkisstjórnina um yvirtøkumálið.

Úrslitið av hesum fundi var, at stjórnin nú góðkendi, at málsøkið kundi yvirtakast sum sermál, og varð samtykt at seta eina blandaða nevnd við umboðum fyri partarnar at koma við hugskoti um eina rammulóg og eina avtalu um yvirtøkuna.

Serkøna nevndin fór í gongd við arbeiði sítt í byrjanini av 1991.

Um árskiftið 1991-92 kom stígur í nevndararbeiðið, tí partarnir ikki mettu seg at fáa undirtøku frá politisku myndugleikunum hjá hvørjum øðrum til tey uppskot, ið partarnir hvør sær høvdu framlagt í nevndini.

Politiskar samráðingar vóru tí tiknar uppaftur millum landsstýrið og stjórnina, og førdu hesar sum kunnugt til, at partarnir tann 11. september 1992 samdust um, at málsøkið skuldi gerast føroyskt sermál.

Endaliga avtalan um yvirtøkuna varð undirskrivað 22. desember 1992.

Punktini 1 - 6 í avtaluni eru ikki nakað serstakt fyribrygdi fyri hesa yvirtøku, men er ein fylgja av vanligu reglunum í heimastýrislógini um yvirtøku av málsøkjum sum sermál. Eftir seinasta stykkinum í avtaluni sigur landsstýrið seg sinnað at nýta sakkøna ráðgeving frá donskum myndugleikum ella privatum fyritøkum, tó bert um kostnaður fyri hesa ráðgeving er kappingarførur.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 80/1992: Yvirtøka av ráevnunum í undirgrundini.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 14. januar 1993 og eftir 1. viðgerð tann 29. januar 1993 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tríggjar minnilutar.

Meirilutin (Olaf Olsen, Birgir Danielsen, Sverre Midjord og Sommer Winther) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja tað. Málið um yvirtøku av ráevnunum í undirgrundini hevur verið viðgjørt í fleiri samráðingarnevndum í nógv ár. Nú er danska stjórnin gingin øllum føroyskum ynskjum á møti; og mælir meirilutin (Olaf Olsen, Birgir Danielsen, Sverre Midjord og Sommer Winther) tí tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Edmund Joensen) tekur ikki undir við uppskotinum út frá hesum viðmerkingum.

Tað aldargamla sambandið millum Danmark og Føroyar hevur ongantíð havt so góð gróðrarlíkindi, sum í hesi øldini. Teknisku framstigini hava gjørt, at samskiftið landanna millum bæði á ein og annan hátt er styrknað, og frástøðan er

nærum eingin forðan meira. Í takt við teknisku framstigini eru eisini hend almikil framstig í føroyska vinnulívinum og í útbyggingini av infrastrukturinum, skúlaskapinum, sosial- og heilsuverkinum. Allur hesin framburðurin er hendur í einum tættum samvirki millum Danmark og Føroyar.

Søgan vísir okkum, at eingir jarðardyrkarar ella fiskimenn nakrantíð eru blivnir peningaliga ríkir av sínum arbeiði. Tvørturímóti hava teir altíð verið millum fátækastu stættir.

At føroyingar, hóast 98% av útflutninginum er komin av fiski, í dag kanska hava hægsta livifót í heiminum, skyldast fyri størsta partin okkara samband við Danmark.

At vit so ikki hava dugað at umsitið ta ábyrgdina, sum sjálvandi fylgir við øllum stuðuli og allari hjálp, tað er so nakað, sum vit í hesum døgum verða tvingað at læra okkum. Kurteisligir, sum danir altíð hava verið, so hava teir ikki viljað skorið treytirnar út í papp, men tolnir bíðað, til vit sjálvir hava funnið út av tí sum sjálvstøðugt hugsandi og ábyrgdarfull menniskju. Men hjartalagið yvir fyri føroyingum er enn sum áður tað sama.

Við heimastýrislógini í 1948 fingu vit eitt nýtt samarbeiðsgrundarlag at byggja framtíðar samvinnuna á. Vit føroyingar hava í høvuðsheitum brúkt heimastýrislógina á trimum økjum: 1 at hækka livifótin, 2 at útbyggja og effektivisera fiskiflotan og 3 at yvirtaka málsøki og harvið nærka okkum loysingini.

Á teimum báðum fyrstu økjunum hava vit sum kunnugt heimsmet. Men hetta hevur samstundis ført við sær, at vit mugu ásanna, at okkara vinnulívsbygnaður als ikki er førur fyri at bera tær útreiðslurnar, tað kostar at halda hetta metið.

Sambært heimastýrislógina kunnu vit yvirtaka eitt og hvørt mál, tá ið ein meiriluti á Føroya løgtingi ynskir tað. Danska stjórnin hevur ongantíð lagt eitt strá í vegin, tá ið vit hava biðið um at fáa yvirtikið eitt málsøki sum sermál. Undantikið, tá ið talan var um undirgrundina. Tá løgdu teir út nakrar fótonglar. Og tað gjørdu teir fyri at geva føroyingum enn ein møguleika fyri at umhugsa støðuna av nýggjum, áðrenn teir yvirtóku seinasta málsøkið, sum kundi rættvísgera ein framhaldandi ríkisfelagsskap. Teir tvíhildu um ein yvirvaldsrætt, hvat ið so tað nú enn var. Politisku leiðararnir í Føroyum skiltu ikki ábendingina, men bulldozaðu víðari. Settu niður eina nevnd av løgfrøðingum, sum skuldu útgreina ta løgfrøðiligu bakgrundina fyri pástandinum, sum sjálvandi ikki er til staðar á okkara døgum. Harvið skuldu teir sláa vápnini úr hondunum á donsku stjórnini. Sjálvandi eydnaðist tað, tí hugtakið yvirvaldsrættur livir bert sum politiskt frøðiheiti nú á døgum.

Anker Jørgensen gav sum ríkisráðharri grønlendingum greitt signal. Yvirtóku teir undirgrundina, so merkti tað loysing. Sum teir gløggskygdu menn, teir eru, lótu teir málið falla.

Føroyingar seta eina æru í treiskni. Teir hildu fram at fara til Danmarkar á fund at júka um undirgrundina, og tað førdi so til, at danir góvu føroyingum eftirlæti. Tá ið teir tann 11. september 1992 skuldu seta seg við borðið í ríkisráðnum, stóðu teir sum Kánus, tá ið ríkisráðharrin gav teimum boðini, at avgerð longu var tikin um, at málsøkið "Ráevni í undirgrundini" verður flutt til føroyskt sermál. (Sostatt er tað søgufalsan, tá ið tað í viðmerkingum landsstýrisins til tinguppskotið stendur, at "partarnir.... samdust um". Danir høvdu einsamallir tikið hesa avgerðina).

Við at lata føroyingum málsøkið "Ráevni í undirgrundini" hevur danska stjórnin í roynd og veru einki alibi fyri at halda upp á Føroyar í ríkisfelagsskapinum. Frá nú av standa Føroyar einans sum ein útreiðslupostur í danska roknskapinum. Hesum kunnu vit takka Føroya Javnaðarflokki fyri fyrst og fremst, sum nú hevur gjørt viðurskiftini millum Føroyar og Danmark til einans at vera ein spurning um krónur og oyru.

Tað er heilt greitt, at tað hevur ein ávísan týdning fyri Danmørk at hava Føroyar og serliga Grønland við í ríkinum. Men tað er eisini eyðsæð, at týdningurin, ið hvussu so er hvat ið Føroyum viðvíkur, ikki liggur í at hava oyggjarnar sum innlivsøkukeldu. Heldur ikki um talan skuldi verið um møguliga útvinning av olju úr undirgrundini. Tað gongur týðiliga fram av tí endaligu avtaluni, sum varð undirskrivað 22. desember 1992.

Spurningurin um undirgrundina er í tvífaldari merking grundarlagið undir samvinnuni millum bæði londini. Føroyingar hava kravt at fáa fult ræði á undirgrundini. Tað hava teir fingið við øllum teimum lepum, sum hanga við. Orð Anker Jørgensens standa enn við makt, eftirsum danir framvegis sita eftir við hægsta trumfinum, yvirvaldsrættinum. Men so valdast, um føroyingar aftur fara at tvíhalda um, at løgfrøðingar skulu prógva, um danir spæla Grev Jas ella Svartaper.

Av øllum yvirtøkum, sum gjørdar eru, íroknað tær, sum vóru gjørdar í 1948, er henda tann mest týdningarmikla fyri lagnuna hjá øllum føroyingum. Tann endaliga gongdin fram móti skilnaðinum Danmarkar og Føroya millum er eftir øllum at døma byrjað. Ta ivasomu æruna fyri verkið kunnu Fólkaflokkurin og Javnaðarflokkurin skifta sínámillum.

Hvussu leingi tilgongdin fer at vara, er ikki lætt at siga. Tað fer undir øllum umstøðum at vera føroysku veljararnir, sum til komandi valini fara at avgera, hvønn politikk, teir ynskja, skal vera førdur. Sambandsflokkurin hevur altíð tónað reint flagg. Har hevur ongantíð nakað verið at ivast í. Aðrir flokkar hava altíð undan vali hildið tað verið hentast at ganga í seyðaskinni.

Júst í hesum døgum prógvar ríkisfelagsskapurin aftur sínar dygdir. Føroyska samfelagið hevur ofta verið fyri tungum bakkøstum og hevur havt brúk fyri eini eyka hjálpandi hond. Eingin ivi er um, at hetta fer at henda aftur. Eitt so lítið samfelag fer altíð at vera viðkvæmt fyri ymsum ávirkanum uttanífrá. Føroyingar

hava havt ómetaliga stóran fyrimun av samvinnuni við Danmørk gjøgnum árini. Vit eru mong, sum ynskja at varðveita møguleikan fyri at halda fram við hesi samvinnu. Ikki einans í trongum tíðum, tá ið tað brýtur í bæði borð, men eisini í góðum tíðum, tá ið eingin beinleiðis vandi er á ferð.

Tí fer minnilutin (Edmund Joensen) ikki at atkvøða fyri hesum uppskotinum.

Minnilutin (Hergeir Nielsen) tekur undir við uppskotinum vísandi til hesar viðmerkingar og uppskot til samtyktar:

Í løgmansrøðuni fyri 1992 sigur táverandi løgmaður, Atli P. Dam í juli mánaða 1992: "Seinna hálvár 1991 tóktust samráðingarnar í felags undirgrundarnevndini at gera stór framstig, men tíverri kom stígur í um ársskiftið, og eru nú vónirnar um eina felags niðurstøðu ikki so bjartar sum á Ólavsøku í fjør. Roknað verður við fundi á politiskum stigi seint í august, sum eina roynd at fáa nevndararbeiðið aftur á beint."

Hesin fundur kom ongantíð í lag. Í september sama ár sigur sami maður kortini í uppskoti landsstýrisins um yvirtøku av ráevnum í undirgrundini,: "Politiskar samráðingar vóru tí tiknar uppaftur millum landsstýrið og stjórnina, og førdu hesar sum kunnugt til, at partamir tann 11. september 1992 samdust um, at málsøkið skuldi gerast føroyskt sermál."

Her er talan um søgurcinging, vísandi til, at eingin politisk samráðing førdi til nakra yvirtøku.

Yvirtøkan av ráevnum í undirgrundini varð handað føroyingum á fundi í Keypmannahavn tann 11. september 1992, ella 6 vikur eftir at løgmaður í røðu síni á Ólavsøku í máttloysi sínum harmaðist um, at stígur var komin í samráðingarnar um yvirtøku av hesum málsøki.

Meiri sannlíkt er tí, at uppskot Tjóðveldisfloksins frá 27. august sama ár førdi til, at danir 14 dagar seinni góvu skarvin yvir, og handaðu okkum okkara sjálvsøgdu rættindi.

Í uppskoti Tjóðveldisfloksins varð nevniliga víst á, at áðrenn hugsjónir Javnaðar- og Fólkafloksins runnu saman í 1991 og gjørdust ein, høvdu føroyingar vunnið alt tað løgfrøðiliga og fólkarættarliga stríðið mótvegis dønum, og at danir vóru gingnir við til samráðingar um eina yvirtøku til sermál.

Hóast hetta, so sigur varaløgmaður, Jógvan Sundstein, í svari til ein fyrispurning frá Finnboga Ísakson frá 17. apríl 1991, at teir so at siga hava slept upprunaligu avtaluni um yvirtøku til sermál. Nú skuldi kannast, um tað var møguligt at yvirtaka umsitingina av ráevnisøkinum til sermál, og um eina ráevnisskipan, sum skuldi skipast undir einari danskari rammulóg.

Sitandi landsstýrið hevði sostatt slept vunnum rættindum frá 1988. Tí er als einki at reypa sær av í hesum máli. Danska stjórnin tók av sínum eintingum og skifti støðu í hesum máli.

Í uppskoti sínum frá 27. august vísti Tjóðveldisflokkurin eisini á, at danir, samstundis sum teir úti í heimi erpa sær av, fáa heiðurstekin fyri og eru undangongumenn til at tala frælsisins søk fyri øðrum tjóðum, roynast sannir hjálandaharrar í víðastu merking, tá íð tað gagnar egnum áhugamálum í Føroyum.

Tað er einki at ivast í, at danir hava tikið atfinningar okkara at sær, og tænir tað teimum til rós. Haraftrat kemur, at komandi EF-oljudirektivið hevur við sær, at danir missa rættindi teirra sum "statens overhøjhedsret" yvir føroyskari ráevnisvinnu, tí at øll hini EF-londini hava sambært direktivinum um kappingarføri javnbjóðis rættindi við danir í ráevnisvinnu í donskum øki.

Tí var tað eisini skilagott av dønum at handa okkum hesi rættindi, sum teir høvdu mist kortini sambært komandi oljudirektivi hjá EF, sum kemur í gildi aftan á "fyri aðru ferð" fólkaatkvøðuna um Maastrichtsáttmálan tann 18. mai í ár.

Tann stóri spurningurin er hinvegin, hvussu skilagott tað var av landsstýrinum at góðtaka, at danir uttan víðari í avtaluni tryggja sær rættindi til egin samfelags- og vinnulívsáhugamál í føroyskari ráevnisvinnu.

Soleiðis sum støða Danmarkar Føroya millum um niðurbinding av føroyska samfelagnum, hevur tikið seg upp verður tí skotið upp soljóðandi:

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Landsstýrinum verður álagt at taka upp samráðingar við donsku ríkisstjórnina um, at seinasta brotið um hjálandavinnu í avtaluni millum stjórnina og landsstýrið um ráevni í undirgrundini fellur burtur.

Minnilutin (Helena Dam á Neystabø) kann taka undir við avtaluni millum Føroya landsstýri og ríkisstjórnina um at yvirtaka umsitingina av ráevnunum í undirgrundini.

Spurningurin viðvíkjandi yvirtøku av føroysku undirgrundini varð á fyrsta sinni lagdur fyri løgtingið av Sjálvstýrisflokkinum í 1974. Í 1975 varð málið samtykt á Føroya løgtingi.

Tað er harmuligt, at tað eru gingin 17 ár, áðrenn málið endiliga varð fingið upp á pláss. Vit kunnu nú staðfesta, at tíðin hevur ikki arbeitt til fyrimuns fyri Føroyum, tvørturímóti.

Tað er neyðugt, at landsstýrið leggur alla sína orku í at fáa loyst marknatrætuna við Bretland sambært miðlinjuprinsippinum og at samband verður tikið upp við bretsku stjórnina, til tess at fáa í lag samstarv við Bretland um øll mál av felags áhuga.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin (Helena Dam á Neystabø) undir við uppskoti landsstýrisins.

# 81. Løgtingslóg um stuðul til feskfiskaflotan

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um stuðul til feskfiskaflotan.*

**§ 1.**

Endamálið við hesi lóg er at umleggja ein part av tí stuðli, sum hevur verið latin feskfiskaflotanum sum prísískoyti o.a., til eitt tíðaravmarkaðan, umsetiligan fløgustuðul til eitt avmarkað tal av feskfiskiførum yvir 20 BRT.

**§ 2.**

Landsstýrinum verður heimilað av árligu játtanini á fíggjarlógini at veita studning til eigarar av fiskiførum við hesum veiðuloyvum:

1) Feskfiskaveiða á føroysku landleiðini við førum millum 20 og 110 BRT.
2) Feskfiskaveiða á føroysku landleiðini við troli við førum omanfyri 110 BRT.
3) Feskfiskaveiða á landleiðini við øðrum reiðskapi enn troli við før-

*lagtingslov om støtte til feskfiskerflåden.*

**§ 1.**

Formålet med denne lov er at omlægge en del af den støtte, som hidtil er blevet tildelt ferskfiskerflåden som pristilskud m.m. til en tidsbegrænset, omsættelig driftsstøtte til et begrænset antal fiskerfartøjer over 20 BRT.

**§ 2.**

Det hjemles landsstyret af den årlige bevilling på finansloven at give støtte til ejere af fiskerfartøjer med følgende fangstlicenser:

1) Ferskfiskefangst på færøsk fiskeriterritorium med fiskerfartøjer, der er mellem 20 og 110 BRT.
2) Ferskfiskefangst på færøsk fiskeriterritorium med trawl med fiskerfartøjer, der er over 110 BRT.
3) Ferskfiskefangst på færøsk fiskeriterritorium med andre redskaber

um oman fyri 110 BRT.

§ 3.

Talið av veiðiloyvum og árligu upphæddimar, sum verða latnar í stuðuli til hvørt veiðiloyvið, eru hesi:

1) Lemmatrolarar frá 1977 og yngri: Til 8 veiðiloyvi kr. 1.312.000.
2) Lemmatrolarar frá 1976 og eldri: Til 5 veiðiloyvi kr. 1.049.000.
3) Stállínuskip frá 1984 og yngri: Til 2 veiðiloyvi kr. 790.000.
4) Stállínuskip frá 1968 til 1983: Til 5,42 veiðiloyvi kr. 632.000.
5) Stállínuskip frá 1967 og eldri: Til 12 veiðiloyvi kr. 474.000.
6) Partrolarar frá 1984 og yngri: Til 12 veiðiloyvi kr. 1.046.000.
7) Partrolarar frá 1980 til 1983: Til 5 veiðiloyvi kr. 813.000.
8) Partrolarar frá 1970 til 1979: Til 15 veiðiloyvi kr. 581.000.
9) Partrolarar frá 1969 og eldri: Til 10 veiðiloyvi kr. 349.000.
10) Útróðrarbátar, 20 til 39,9 BRT við serligum fiskiloyvi: Til 12 veiðiloyvi kr. 118.000.
11) Útróðrarbátar, 20 til 39,9 BRT uttan serligt fiskiloyvi: Til 11 veiðiloyvi kr. 148.000.
12) Útróðrarbátar, 40 til 59,9 BRT við serligum fiskiloyvi: Til 31 veiðiloyvi kr. 177.000.
13) Útróðrarbátar, 40 til 59,9 BRT uttan serligt fiskiloyvi: Til 2 veiðiloyvi kr. 221.000.
14) Útróðrarbátar, yvir 60 BRT: Til 16 veiðiloyvi kr. 236.000.

end trawl med fiskefartøjer, der er over 110 BRT.

§ 3.

Antallet af fangstlicenser og de årlige beløb, som ydes i støtte til hver licens, er følgende:

1) Skovltrawlere fra 1977 og yngre: Til 8 fangstlicenser kr. 1.312.000.
2) Skovltrawlere fra 1976 og ældre: Til 5 fangstlicenser kr. 1.049.000.
3) Stållineskibe fra 1984 og yngre: Til 2 fangstlicenser kr. 790.000.
4) Stållineskibe fra 1968 til 1983: Til 5,42 fangstlicenser kr. 632.000.
5) Stållineskibe fra 1967 og ældre: Til 12 fangstlicenser kr. 474.000.
6) Partrawlere fra 1984 og yngre: Til 12 fangstlicenser kr. 1.046.000.
7) Partrawlere fra 1980 til 1983: Til 5 fangstlicenser kr. 813.000.
8) Partrawlere fra 1970 til 1979: Til 15 fangstlicenser kr. 581.000.
9) Partrawlere fra 1969 og ældre: Til 10 fangstlicenser kr. 349.000.
10) Hjemmefiskerfartøjer, 20 til 39,9 BRT, med særlig fiskeritilladelse: Til 12 fangstlicenser kr. 118.000.
11) Hjemmefiskerfartøjer, 20 til 39,9 BRT, uden særlig fiskeritilladelse: Til 11 fangstlicenser kr. 148.000.
12) Hjemmefiskerfartøjer, 40 til 59,9 BRT, med særlig fiskeritilladelse: Til 31 fangstlicenser kr. 177.000.
13) Hjemmefiskerfartøjer, 40 til 59,9 BRT, uden særlig fiskeritilladelse: Til 2 fangstlicenser kr. 221.000.
14) Hjemmefiskerfartøjer over 60 BRT: Til 16 fangstlicenser kr. 236.000.

**Stk 2.** Árstalið er byggiárið.

**Stk. 3.** Við serligum fiskiloyvi skilst: Fiskiloyvi undir Íslandi, trolloyvi innan fyri 12 fjórðingar og línuloyvi á Føroya Banka.

**4. stk.** Treytin fyri at stuðul verður veittur er, at veiðan verður avreidd í Føroyum og at í minsta lagi 50% av veiðini hjá fiskifarinum verða seld á einari uppboðssølu, sum landsstýrið hevur góðkent.

§ 4.

Fyri fiskifør, nevnd undir § 3, nr. 5, 8 og 9, verður stuðulsupphæddin útgoldin í eins stórum mánaðargjøldum í 3 ár, meðan hon fyri hini fiskiførini verður útgoldin í eins stórum gjøldum í 5 ár.

**Stk. 2.** Stuðulin kann eftir umsókn verða útgoldin í einum, um veiðiloyvið verður latið landsstýrinum endaliga, ella fiskifarið verður umbýtt við annað yngri fiskifar, sum hevur somu ella minni veiðiorku og ikki er eldri enn 10 ár.

**Stk. 3.** Stuðulin eftir hesi lóg kann eftir umsókn við loyvi frá landsstýrinum flytast yvir á annað fiskifar upp á upprunaligu treytirnar, um eitt veiðiloyvi verður latið endaliga inn.

**Stk. 4.** Landsstýrið ásetir í kunngerð tal av veiðuloyvum í hvørjum av teimum skipabólkum, sum eru nevndir í hesi lóg, tó so at talið ikki kann fara upp um tey, sum eru nevnd § 3, stk. 1, nr. 1 - 9. So hvørt veiðiloyvi verða latin inn, skal talið á partrolarum koma í minsta lagi niður á 36, talið á stállínuskipum niður á 16 og talið á lemmatrolarum

**Stk. 2.** Årstallet refererer til byggeår.

**Stk. 3.** Med særlig fiskeritilladelse forstås: Tilladelse til fiske ved Island, tilladelse til at trawle inden for 12 mil samt tilladelse til at fiske med line på Færø Banke.

**Stk. 4.** Betingelsen for, at støtte udbetales, er, at fangsten bliver landet på Færøerne, og at mindst 50% af fiskerfartøjets fangst bliver solgt på en af landsstyret godkendt auktion.

§. 4

For fiskerfartøjer, nævnt under § 3, nr. 5, 8 og 9, bliver støtten udbetalt i lige store månedsrater over 3 år, mens den for de andre grupper betales i lige store månedsrater over 5 år.

**Stk. 2.** Hele støtten kan efter ansøgning udbetales på en gang, hvis fangstlicensen indleveres endeligt til landstyret eller fiskerfartøjet bliver udskiftet med et andet yngre fartøj, med samme eller mindre fangstkapacitet, og som ikke er mere end 10 år gammelt.

**Stk. 3.** Støtten efter denne lov kan efter ansøgning med landsstyrets tilladelse overføres til andet fiskerfartøj, på de oprindelige betingelser, hvis en fangstlicens endeligt indleveres.

**Stk. 4.** Landsstyret fastsætter i bekendtgørelse, hvor mange fangstlicenser, der kan udstedes i hver af de fartøjsgrupper, der er nævnt i denne lov. Antallet af fangstlicencer, der kan udstedes, må ikke overstige antallet, der er nævnt i § 3 stk. 1, nr. 1 - 9. Efterhånden som fangstlicenser afleveres, skal antallet af partrawlere mindst bringes

niður á 11.

§ 5.

Undantikið í teimum førum, sum nevnd eru í § 4, stk. 2, steðgar útgjaldingin av stuðulinum, tá fiskifar skiftir eigara ella ikki er í vinnu.

Stk. 2. Tá ið eigaraskiftið fer fram kann landsstýrið - eftir umsókn - loyva, at tað, sum er eftir av stuðlinum, verður goldið nýggja eigaranum.

§ 6.

Landsstýrinum verður heimilað at umleggja stuðuls-, kurstaps- og serlán í fiskiførum, sum koma undir hesa lóg, verða umløgd til rentu- og avdráttarfrítt studningslán, sum verður avskrivað yvir 10 ár. Hetta er bert galdandi fyri skuld, sum ikki er fallin til gjaldingar pr. 31. desember 1992.

**2. stk.** Um so er, at fiskifar, sum hevur fingið hesa umlegging, skiftir eigara ella letur veiðuloyvið inn, fellur lánið ella tað, sum stendur eftir, til gjaldingar. Landsstýrið kann eftir umsókn loyva, at tað, sum stendur eftir av lánum, verður standandi í fiskifarinum.

**3. stk.** Studningslánið verður tryggjað best møguliga við veðrætti í fiskifarinum.

§ 7.

Landsstýrinum verður heimilað eftir umsókn at niðurgjalda lán í fiskifari, sum kemur undir hesa lóg, sum hava landskassaveðhald, í sama lutfalli, sum annar veðhavari ella lángevari niðurskrivar síni lán.

ned til 36, stållineskibe til 16 og skovltrawlere til 11.

§ 5.

Med undtagelse af de tilfælde, der er anført i § 4, stk. 2 standser udbetalingen af støtte, når et fiskerfartøj går ud af drift eller skifter ejer.

**Stk. 2.** Ved ejerskifte kan landsstyret - efter ansøgning - tillade at det, der er tilbage af støtten, skal udbetales til den nye ejer.

§ 6.

Landsstyret hjemles til at omlægge støtte-, kurstabs- og særlån i fiskerfartøjer, der omfattes af denne lov til rente- og afdragsfri tilskudslån, som afskrives over 10 år. Dette er kun gældende for gæld, som ikke er forfalden pr. 31. december 1992.

**2. stk.** Hvis fiskerfartøjer, der har fået denne omlægning, skifter ejer eller indleverer sin fangstlicens, forfalder lånet, eller det, der står tilbage af det, til betaling. Landsstyret kan efter ansøgning tillade, at lånet eller det, der står tilbage af lånet, bliver stående i fiskerfartøjet.

**3. stk.** Tilskudslånet skal sikres ved pant i vedkommende fiskerfartøj.

§ 7.

Det hjemles landsstyret efter ansøgning at nedbetale lån i et fiskerfartøj, der omfattes af denne lov, som er garanteret af landsstyret i samme forhold, som andre prioritetshavere eller långiver afskriver deres lån.

**§ 8.**

Landsstýrið kann í kunngerð áseta nærri reglur og krøv til skjalprógvan, sum eru neyðug til at útinna hesa lóg.

**§ 8.**

Landsstyret kan i en bekendtgørelse angive nærmere regler og krav til dokumentation, der er nødvendige til denne lovs udførelse

**§ 9.**

Hendan lóg kemur í gildi 18. januar 1993. Fyrsta gjald fyri tann partin av januar, lógin hevur havt gildi, verður goldið út seinast í januar 1993 og síðani í miðjum mánað so leingi, sum gjaldstíðin gongur.

**§ 9.**

Denne lov træder i kraft 18. januar 1993, og første udbetaling sker for den del af januar måned 1993, som loven har været i kraft, sidst i januar måned og siden midt i hver måned så længe, udbetalingerne løber.

**Viðmerkingar:**

Landsstýrið hevur sett sær fyri at broyta stuðulin til fiskivinnuna. Hetta verður gjørt við at lata studningin meira miðvíst fyri at røkka ávísum endamálum, serliga at bøta um samfelagsbúskaparligu støðuna hjá øllum liðum í fiskivinnuni.

Til hetta endamál eru avsettar 23 mió. á § 18 í fíggjarlógini ætlað til umlegging og arbeiðsskapandi tiltøk í virkingarliðnum. Stuðul verður givin til at skapa arbeiði við innfluttum fiski og stuðul verður veittur til umlegging, so at tann ov stóra orka, sum er í vanligari virking av hálvlidnum vørum, verður lækkað og beind yvir á lidnar vørur.

Somuleiðis eru settar 76,8 mió. kr. til inntøkutrygd hjá fiskimonnum eftir lóg um minstuløn v.m. á § 19 í fíggjarlógini.

Til bátaflotan undir 20 BRT eru settar 5 mió. av á fíggjarlógini. Landsstýrið ætlar at leggja lógaruppskot fyri løgtingið í næstum um, hvussu hesin peningur skal býtast.

Seinast eru settar 55 mió. kr. av til íløgustuðul eftir hesi lóg. Fluttar eru 10-13 mió. frá fíggjarárinum 1992 til sama endamál. Talva 1. vísir eitt yvirlit yvir íløgustuðulin.

Landsstýrið hevur lagt dent á gera eina skipan, sum eitt avmarkað tíðarskeið veitir stuðul undir treytum, sum eru greiðar hjá vinnuni. Sostatt skuldu tey, sum reka skip, havt møguleika fyri at leggja ætlanir fyri tað tíðarskeið, sum stuðulin fevnir um út frá greiðum fyritreytum. Hetta gevur so aftur møguleikar at laga kostnaðarstøðið eftir hesum.

Í endamálinum liggur eisini eitt ynski um at laga fiskiflotan undir Føroyum úl tilfeingið, og er hetta gjørt við í lógini at seta talið á veiðiloyvum í hvørjum veiðibólki og fyri ávísar bólkar tal á veiðuloyvum, sum miðað verður ímóti at

røkka, so hvørt veiðiloyvi verða latin inn. Um so er at fiskiførunum verður álagt at royna partar av árinum við veiðiloyvum og fiskiloyvum, sum ikki eru nevnd í hesari lóg, kann landsstýrið víkja frá kravinum um, at talið á veiðiloyvum til línu og lemmatrolarar lækkar, sum ásett í § 4, stk.4.

Ávís vinnufeløg hava skotið upp at áseta kvotaskipanir undir Føroyum. Hugsað hevur verið um, at hvørt veiðiloyvi fekk ávísan prosentpart av heildarveiðuni. Hetta kundi so sett gongd á, at veiðiloyvi vórðu løgd saman fyri at vissa skipunum nóg stórar kvotur til haldgóðan rakstur. Á tann hátt kundi veiðuflotin lagast til tilfeingið.

Landsstýrið hevur ikki valt hesa loysn. Ivasamt er, um kvotuskipan er tað rætta. Tey londini, sum hava nýtt hesa skipan í nógv ár, tykjast meira og meira at koma til ta miðurstøðu, at kvotaskipanin ikki er gongd leið at laga veiðiflotan til tilfeingið, tí tað ikki er møguligt at hava nóg gott eftirlit við kvotunum.

Hendan lóg nýtir í staðin umsetiligan íløgustuðul til at røkka sama málið. Lógin ásetir, at um eitt veiðuloyvi verður latið endaliga inn, so kann íløgustuðulin leggjast aftrat stuðlinum hjá øðrum fiskifari og soleiðis bøta um rakstrarmøguleikarnar. Hesin umsetiligi stuðulin kemur í staðin fyri tann partin av prísískoyti v.m., sum er farin til skipini.

Í lógini verður ásett, at tá fiskifar verður selt, kann landsstýrið loyva at íløgustuðulin fylgir við. Landsstýrið ætlar í kunngerð sambært § 8 at áseta, hvat landsstýrið vil leggja til grund fyri málsviðgerðini av tílíkum umsóknum. T.d. kann fyrilit verða tikið fyri óhepnari miðsavnan av veiðiloyvum. Eisini verður í lógini heimilað landsstýrinum at leggja stuðuls-, ser-, og kurstapslán um til rentu og avdráttrafrí studningslán, sum verða avskrivað yvir 10 ár.

Prísískoyti var bert latið til fisk, sum varð landaður í Føroyum. Landsstýrið hevur varðveitt hetta í samband við íløgustuðulin. Í kunngerð kemur at verða ásett, at tá árið er liðið, verður gjørt upp, hvussu nógv fiskiførini hava avreitt uttanlands. Íløgustuðulin verður so minkaður í sama lutfalli, sum avreiðingarnar uttanlanda eru av øllum, sum fiskifarið hevur avreitt. Samstundis verður skotið upp, at 50% skulu verða seld um eina uppboðssølu, sum landsstýrið hevur góðkent. Hetta verður gjørt fyri at tryggja, at góður prísur fæst fyri fiskin. Landsstýrið ætlar fyri tingið at leggja uppskot um flutningsstuðul, so at øll øki í landinum eru javnt fyri til at keypa fisk á uppboðssølu.

Landsstýrið skjýtur upp, at Lønjavningargrunnurin hevur dagligu umsitingina av hesi lóg. Mett verður, at umsitingin av lógini ikki krevur eyka útreiðslur á fíggjarlógini.

# Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 81/1992: Løgtingslóg um stuðul til feskfiskaflotan.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 15. januar 1993 og eftir 1. viðgerð 15. januar 1993 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur eisini viðgjørt skriv frá Føroya Fiskimannafelag og Føroya Ráfiskakeyparafelag.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minniluar.

Meirilutni (Henrik Old, Frank Davidsen, Anfinn Kallsberg og Olaf Olsen) vísir á, at landsstýrissamgongan hevur sett sær fyri at broyta stuðulin til fiskivinnuna. Landsstýrið sigur í viðmerkingunum til málið m.a. "hetta verður gjørt við at lata studningin meira miðvíst fyri at røkka ávísum endamálum, serliga at bøta um samfelagsbúskaparligu støðuna hjá øllum liðum í fiskivinnuni". Eisini verður sagt, at í endamálinum liggur eitt ynski um at laga fiskiflotan undir Føroyum til tilfeingið.

Meirilutin er undir viðgerðini komin fram á ymiskar smávillur í lógaruppskotinum, ið eiga at verða rættaðar. Eisini hevur meirilutin uppskot til ymiskar aðrar broytingar í lógaruppskotinum.

Í uppskotinum verða allar skipastøddirnar uppgivnar í BRT og støddirnar á útróðrarbátum verða uppgivnar í BRT við einum desimali.Upplýst er frá Skipaeftirlitinum, at tá ið skip verða máld í BRT, er reglan tann, at mált verður við tveimum desimalum, men um skip verða máld í GT, verða skip undir 24 m longd máld við einum desimali, meðan skip yvir 24 m longd verða máld í heilum tølum. Neyðugt verður tí at broyta tølini í § 3 10), 11), 12) og 13) frá ávikavist 39,9 BRT og 55,9 BRT til ávikavist 39,99 BRT og 59,99 BRT og verður sett fram broytingaruppskot samsvarandi hesum.

Í § 3, 4. stk. verður skotið upp, hvussu treytirnar fyri at fáa stuðul skulu verða, m.a. at í minsta lagi 50% av veiðini hjá fiskifarinum verða seld á uppboðssølu. Meirilutin mælir til at broyta hetta stykki og setir fram uppskot um, hvussu stuðulin verður roknaður, um farið verður uttanlands at landa veiðuna. Eisini mælir meirilutin til at broyta tann partin, sum skal seljast á uppboðssølu, úr 50% niður í 30% og setir fram broytingaruppskot samsvandi hesum.

Í § 4, stk. 3 verður skotið upp, at stuðulin eftir hesi lóg kann eftir umsókn flytast yvir á annað fiskifar upp á upprunaligu treytirnar, um eitt veiðiloyvi verður latið endaliga inn. Meirilutin skjýtur upp, at eisini serlig fiskiloyvi eiga at kunna flytast yvir á annað fiskifar, tó kunnu fleiri loyvir leggjast ikki saman til eitt og sama far, tá hetta hevði viðført arbeiðsloysi. Meirilutin setir fram broytingaruppskot hesum viðvíkjandi.

Í § 6 verður skotið upp, at landsstýrinum veðrur heimilað at umleggja stuðuls-, kurstaps- og serlán í fiskiførum, sum koma undir hesa lóg, til rentu- og avdráttarfrítt studningslán, sum verður avskrivað yvir 10 ár. Tá heimildin t.d. til at veita serlán til fiskifør er hjá landsstýrinum saman við fíggjarnevndini, mælir meirilutin til, at § 6 verður broytt soleiðis, at heimildin verður hjá landsstýrinum saman við fíggjarnevndini. Í § 6 er komin ein villa í føroyska lógartekstin, við tað at orðini "verða umløgd" eru komin ov nógv inn í tekstin, og mælir meirilutin til at strika hesi. Í § 6, 2. stk. í danska lógartekstinum eru orðini "lånet eller" komin ov nógv í tekstin, og verður skotið upp at strika tey. Í § 6, 3. stk. í danska lógartekstinum mangla orðini "best muligt" og verður skotið upp, at tey verða sett inn aftan á orðið "sikres".

Í § 7 verður skotið upp, at landsstýrinum verður heimilað eftir umsókn at niðurgjalda lán í fiskifari, sum kemur undir hesa lóg. Meirilutin mælir til, at hetta verður broytt til, at landsstýrinum verður heimilað, saman við løgtingsins fíggjarnevnd, at yvirtaka part av láni í fiskiførum, sum hava landskassaveðhald í sama lutfalli, sum annar veðhavari ella lángevari niðurskrivar síni lán og setir fram broytingaruppskot samsvarandi.

Í § 9 verður skotið upp, at lógin kemur í gildi 18. januar 1993. Tá hesin dagur er farin afturum, mælir meirilutin til, at lógin fær gildi dagin eftir, hon er kunngjørd. Eisini verður neyðugt at broyta orðingina í § 9, sum ásetir, hvussu fyrsta gjald av stuðlinum skal útgjaldast, og setir meirilutin fram broytingaruppskot um hetta.

Við omanfyrinevndu broytingum mælir meirilutin løgtinginum til at samykkja uppskot landsstýrisins og setir samsvarandi hesum fram soljóðandi:

**broytingaruppskot**

**til**

**uppskot landsstýrisins**

| | |
|---|---|
| 1) Í § 3 verður undir 10) "39,9 BRT" broytt til "39,99 BRT", undir 11) "39,9 BRT" broytt til "39,99 BRT", undir 12) "59,9 BRT" broytt til "59,99 BRT" og undir 13) "59,9 BRT" broytt til "59,99 BRT". | 1) I § 3 bliver under 10) "39,9 BRT" ændret til "39,99 BRT", under 11) "39,9 BRT" ændret til "39,99 BRT", under 12) "59,9 BRT" ændret til "59,99 BRT" og under 13) "59,9 BRT" ændret til "59,99 BRT". |
| 2) § 3, stk. 4 verður soljóðandi:<br>"Stuðulin verður útgoldin eina ferð um mánaðin við 1/12 av árs- | 2) § 3, stk. 4 formuleres:<br>"Tilskuddet udbetales en gang om måneden med 1/12 af årstilskuddet. |

stuðlinum. Hann verður útgoldin av lønjavningargrunninum so skjótt, hesin hevur fingið útskrift úr dagbókini hjá fiskifarinum fyri mánaðin frammanundan. Um farið landar sína veiðu uttanlands, verður frádrigið í stuðlinum tað, sum svarar til teir dagar, sum veiðitúrurin hevur vart, sum varð avreiddur uttanlands. Túrurin verður roknaður frá tí degi, sum fiskiskapurin byrjar, og til fiskiskapurin byrjar næsta túr, ella til farið er aftur í føroyska havn. Tað, sum verður frádrigið, er ársstuðulin, býttur við 360 og faldaðnr við talið á døgunum, sum túrurin vardi."

Tilskuddet udbetales af Lønjavningargrunninum, så snart denne har fået udskrift af fiskeskibets dagbog for måneden forud. Såfremt skibet lander sin fangst i udlandet, fradrages i tilskuddet så meget, som svarer til de dage, fiketuren har varet, hvor fangsten bliver solgt i udlandet. Turen regnes fra den dag, fiskeriet påbegyndtes og indtil ny fangsttur påbegyndes, eller når skibet er tilbage i færøsk havn. Fradraget er årstilskuddet, divideret med 360 og ganget det antal dage, turen har varet".

3) Sum nýggj § 3 stk. 5 verður sett:
"Onnur treyt fyri at fáa stuðul er, at í minsta lagi 30% av veiðini hjá fiskifarinum verður seld á uppboðssølu, sum landsstýrið hevur góðkent."

3) Som ny § 3, stk. 5 indsættes:
"Anden betingelse for at erholde tilskud er, at minst 30% af skibets fangst sælges på auktion, der er godkent af landsstyret".

4) Í § 4, stk. 3 verður aftan á orðið "Stuðulin" sett inn "og serlig fiskiloyvi".

4) I § 4, stk. 3 indsættes efter ordet "Støtten" "og særlig fiskeritilladelse".

5) Í § 6 verður aftan á orðið "heimilað" sett inn "saman við løgtingsins fíggjarnevnd".

5) I § 6 indsættes efter ordene "hjemmel til" "sammen med lagtingets finansudvalg".

6) Í § 6 verða í føroyska tekstinum orðini "verða umløgd" strikað.

6) Dansk tekst, inden ændring.

7) Føroysk tekst, eingin broyting.

7) I § 6, 2. stk. slettes ordene "lånet eller".

8) Føroysk tekst, eingin broyting.

8) I § 6, 3. stk. indsættes efter ordet "sikres" "bedst muligt".

9) § 7 verður soljóðandi:
"Landsstýrinum verður heimilað saman við løgtingsins fíggjarnevnd at yvirtaka part av láni í fiski-

9) § 7 formuleres således:
"Landsstyret bemyndiges til sammen med lagtingets finansudvalg at overtage del af lån i fiskeskib og

fari, sum hava landskassaveðhald, í sama lutfalli, sum annar veðhavari ella lángevari niðurskrivar síni lán."

**10)** § 9 verður soljóðandi:

"Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Útgjaldingar sambært hesa lóg fara fram í miðjum mánað, so leingi gjaldstíðin gongur."

er garanteret af landsstyret, i samme forhold som anden panthaver eller långiver nedskriver sine lån."

10) § 9 formuleres således:

"Denne lov træder i kraft dagen efter, den er bekendtgjort. Udbetalinger i henhold til denne lov foretages medio måned så længe betalingstiden løber."

Minnilutin (Terje Davidsen og Jákup Lamhauge) hevur hesar viðmerkingar:

Fyri árum síðan kom meir og meir fram, at virka meir burtur úr tí fiski, sum varð fiskaður undir Føroyum – vit fingu eina røð av flakavirkjum og bátarnir byrjaðu at avreiða í Føroyum ístaðin fyri at selja uttanlands. Sum støðan hjá fiskiskipunum var, varð tað møguligt at fáa endarnar at røkka, við at selja uttanlands. Politiskt ynski var tá, at royna at fáa fiskin í land á føroysk flakavirkir. Hetta gav tá hópin av arbeiðsplássum í landi. Men greitt var, at skuldu fiskiskip og manning klára seg við at lauda í Føroyum, mátti studningur til – ein ávís afturbering var neyðug.

Tá búskaparstøðan var góð og fiskiskapurin rímuligur, bar til at bera nógv aftur.

Tey seinru árini er av álvara vend komin í føroyska búskapin. Landskassin, sum vegna ovurstórar íløgur, hevur fingið ov stórar útreiðslur at dragast við, klárar ikki at bera so nógv aftur longur. At so fiskiskapurin eisini er minkaður so nógv, hevur gjørt støðuna verri, soleiðis at vónleyst er at fáa skipini at bera seg um stuðulin minkar og serliga um hann minkar ov knappliga. Lági fiskaprísurin saman við lítlum stuðuli eggjar til, at meir og meir av fiski verður seldur aðrastaðni enn í Føroyum. Hetta hevur óhepnar fylgjur fyri føroyska samfelagið.

Fiskivinnan er grundarlagið undir einum stórum parti av virkseminum á landi. Tí er greitt, at steðgar fiskivinnan upp, so merkist hetta nógv uppi á landi við hækkandi arbeiðsloysi og versnandi samfelagsbúskapi annars.

Fyri at fáa arbeiði til fleiri hendur og økt útflutningsvirði burturúr fiskinum, hevur verið lagt upp til frá ymiskum síðum, at gera meiri viðgjørdar vørur burturúr tí minkaðu fiskanøgdini. Samgongan millum Sambandsflokkin, Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin gjørdi lógir um stuðul til meirgóðsking av fiski og lóg um stuðul til innkeyp av fiski úr øðrum londum. Ein ávís foredling er byrjað á ymiskum flakavirkjum. Hesi virkir eru í eini tillagingartíð og eru tí reiðiliga viðbrekin og hava serliga brúk fyri stuðuli í hesi tíð.

Samgongan sum kom í 1989 (Sambandsflokkurin, Fólkaflokkurin og Tjóðveldið) gjørdi eitt megnararbeiðið fyri at fáa eina avvigaða loysn, sum gjørdi nýtslu av verandi flakavirkjum. Hesi høvdu so stóran týdning fyri tað nærsamfelag tey vóru í. Tey fingu við ráfiskabýtinum tillutað sín %-part. Hetta tryggjaði, at ikki partar av landinum vóru við skerdan lut, so sum vit í dag eru vitni til t.d. í Vík og í Vági og á Toftum fyri at nevna nøkur. Tá var eisini greitt at fiskiflotin hevði ov stóran kapasitet og ærligar royndir vórðu gjørdar at minka um veiðitrýstið. Eisini var greitt, at neyðugt var við stuðuli, fyri at fáa skipini at landa í Føroyum. Hinvegin var eisini greitt, at neyðugt var at minka stuðulin stigvíst og varðisliga, so arbeiðsplássini á landi fingu tíð til at umstilla seg til nýggjar framleiðslur og á tann hátt kundu liva við minkandi rávørunøgd og minkandi stuðuli.

Samgongan aftaná valið 1990 (Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin) løgdu á annan bógv. Ráfiskabýtið varð avtikið og stuðulin til fiskivinnuna minkaði stórliga. Hetta ger at nógv virkir, sum eru í eini umleggingarfasu, nú fáa teppið tikið undan sær. At hetta hevur óhepnar fylgjur er eyðsæð.

Ein liður í landsstýrisins politikki er hetta uppskotið um fløgustuðul. Í viðmerkingunum til lógaruppskotið verður byrjað við at siga, at hetta uppskotið er fyri at bøta um samfelagsbúskaparligu støðuna í øllum liðum í fiskivinnuni.

Minnilutin metir, at hetta lógaruppskotið røkkur ikki hesum máli. Upphæddirnar eru ov lágar.

Í fíggjarlógaruppskotinum hjá Sambandsflokkinum fyri árið 1993 var avsett meir til fiskivinnuna. Hetta varð tí verri ikki samtykt. Skal fiskivinnan ikki steðga upp, er neyðugt at játtanin er hægri. Tí setir minnilutin fram soljóðandi:

**Uppskot I**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at veita fiskivinnuni eina játtan, í tryggjar at fiskivinnan ikki steðgar upp. Upphæddin verður tikin av játtanini til fløgur á verandi fíggjarlóg.

Í uppskotinum verður nevnt, at 6 skip skulu fáa kr. 0,- (null) í fløgustuðuli. Hesi skip hava fiskiloyvi. Við hesari framferð, verður mismunur gjørdur. Tí verður sett fram soljóðandi:

## Uppskot II

## til

## samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at bera so í bandi, at øll skip við fiskiloyvi verða eins fyri lógini, tá stuðul verður tillutaður og ikki gera mun á eftir hvør eigur skipini.

Landsstýrið leggur uppskot fyri tingið um neyðugar lógarbroytingar hesum viðvíkjandi.

Ójavnt er hvussu skip eru fíggjaði. Eftir hesum uppskoti fær tann parturin av fiskaflotanum, sum hevur nógva fígging úr landskassanum at verða ójavnt stuðlaðir í mun til tey skip, sum hava aðra fígging. Hetta er ikki rættvíst. Her má finnast annar karmur, sum viðgerð skip meiri líkastillaði. Tí verður soljóðandi uppskot til samtyktar sett fram:

## Uppskot III

## til

## samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at skipa so fyri, at skip sum ikki hava nógva fígging úr landskassanum,, verða líkastillaði við skip sum hava nógva fígging úr landskassanum. Landsstýrið leggur uppskot um neyðugar lógarbroytingar hesum viðvíkjandi fyri tingið.

Í grein 2 stk. 4, mælir landsstýrið til, at ein treyt fyri, at stuðulin verður veittur er, at veiðan verður avreidd í Føroyum og í minsta lagi 50% av veiðutui hjá fiskifarinum verða seld á einari tvungnari uppboðssølu, sum landsstýrið hevur góðkent.

Sambandsflokkurin tekur sjálvsagt undir við sjónarmiðinum um, at allur fiskur eigur at verða avreiddur í Føroyum til víðari virkingar, so arbeiðspláss verða varðveitt og størri útflutningsvirði fæst.

Men Sambandsflokkurin er ímóti, at vit við lóg krevja at ávíst prosent av veiðuni skal seljast um uppboðssølu. Flokkurin heldur at fríu marknaðarkreftirnar eiga at fáa loyvi at virka.

Sambandsflokkurin setir tí fram fylgjandi:

## Uppskot IV

## til

## samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at skipa soleiðis fyri, at uppboðssølan ikki verður tvungin og at leggja uppskot fyri tingið hesum viðvíkjandi.

Minnilutin Terje Davidsen og Jákup Lamhauge kunnu ikki taka undir við uppskoti landsstýrisins, soleiðis sum tað er framsett, men metir, at tað hevði tænt Føroyum betri, um landsstýrið leggur uppskot fyri tingið sum eru í tráð við hesi omanfyri nevndu ppskot til samtyktar.

Minnilutin (Heini O. Heinesen) tekur ikki undir við uppskotinum, soleiðis sum tað er sett fram.

Aftan á orðaskifti við 1. viðgerð og tveir fundir í fiskivinnunevndini, er tað vorðið greitt, at tað er eingin møguleiki at fáa nakra sum helst ávirkan á, hvussu tann endaliga lógin skal koma at síggja út.

Hetta er tann sokallaði fløgu- og rakstrarstuðulin - ella reiðarastuðulin, ið ætlanin er at seta í verk, nú allur kilostuðul verður tikin av.

Fiskimenn eru nú ikki longur at finna á grein 16 undir fiskivinnumálum, men eru fluttir undir grein 19, ið er sosialmál. Undir sosialmálum eru avsettar 76,8 milliónir krónur til inntøkutrygd fiskimanna, til minstuløn, dagstudning og minstaforvinning. Men tað er ein stórur spurningur, um henda játtan munar nakað sum helst, tí nú kilostudningurin verður tikin av, koma flestu fiskimenn at sigla fyri minstuløn, og tá serliga teir, sum royna eftir teimum bíligaru fiskasløgunum. Tað er tí greitt, at við teimum prísum, vit hava í dag á upsa, skulu stórar nøgdir til at koma upp um minstulønina.

Onnur fiskasløg eru so niðurpínd, at her fæst lítið meira enn at kóka. Hetta lógaruppskot má tí sigast at vera eitt politiskt neyðaregg, eitt neyðaregg, sum gevur partrolaraflotanum møguleika at halda fiskastovnunum niðri á einum so lágum støði, at tað ikki skal loysa seg at fiska hjá nøkrum, heldur ikki hjá partrolarunum. Hetta kann bert gerast við stórum studningi úr landskassanum. Tað er langt síðani prógvað, at partrolaraflotin er meiri enn helvtina ov stórur.

Uppskot landsstýrisins leggur ikki upp til at minka nóg mikið um trýstið á fiskastovnarnar, uppskotið seigpínir allan flotan, tí upphæddirnar eru ov lágar. Úrslitið verður, at flestu skipabólkar hava ikki ráð at loysa um nakrar mánðir, um hetta ikki longu er so.

Lógaruppskotið leggur upp til, at vit skulu framhaldandi hava 36 partrolarar undir Føroyum. Útrokningar hjá peningastovnunum vísa, at tað ikki er rúm fyri meira enn 20, um hesir skulu fáa raksturin at hanga saman við teirri nøgd, sum ráðiligt er at fiska í dag.

Tølini hjá fiskifrøðingum hava víst tað sama. Í 1992 vórðu fiskað 80.000 tons undir Føroyum, umleið tað sama, sum mett varð og metingar fiskifrøðinganna fyri hetta árið, 1993, siga 75.000 tons. Vit vóna tó, at nøgdirnar verða størri. Men sjálvt um vit koma uppaftur á tey 110.000 til 120.000 tonsini árliga, so klára hesir 20 partrolararnir saktans at fiska tað, sum forsvarligt er at fiska á Føroyagrunninum.

Arbeiðsloysið í Føroyum er stórt og tað er vaksandi. Tí skuldu vit helst kunnað økt eitt sundur um húkaflotan í hesum tíðum, ikki minst tá ið havt verður í huga, at hesi arbeiðsplássini á sjónum kosta ikki meiri enn eini 10 - 20% av tí, sum arbeiðsplássini umborð á trolarunum kosta. Hetta vísir eisini fyriliggjandi lógaruppskot landsstýrisins um íløgustuðul. Breið semja man vera um, at húkurin er tann veiðihátturi, sum hevur roynst føroyingum hollastur á Føroyaleiðini og soleiðis man eisini fara at vera í framtíðini. Tað er greitt, at hevði tolararflotin ongantíð verið blivin so stórur, sum støðan er í dag, so vóru fiskastovnarnir undir Føroyum heldur ikki so útpíndir, sum teir eru. Avleiðingarnar høvdu tá heldur ikki kenst so meinar og ikki lagt so stóran part av samfelagnum lamið, sum vit síggja í dag, har skip og virkir ikki eru í vinnu, tí fiskastovnarnir eru niðurfiskaðir.

Uppskot landsstýrisins leggur alt ov lítlan dent á at uppbyggja fiskastovnarnar aftur undir Føroyum. Hetta verður lýst í niðanfyristandandi talvu, sum lýsir býtið millum trol og húk. Hetta sigur okkum so mikið, at veiðitrýstið undir Føroyum ikki verður minkað eftir hesi lógini. Lógin byggir á eitt søguligt býti, sum gevur trolaraflotanum 65,55% av teimum 304,2 mió. kr., ið uppskotið kostar fyri lógarskeiðið, meðan húkurin fær 34,45%.

## Broytingaruppskot

## til

*Løgtingslóg nr. 81/1992: Løgtingslóg um stuðul til feskfiskaflotan.*

Meirilutin í fiskivinnunevndin (Henrik Old, Jógvan A. Johannessen, Anfinn Kallsberg og Jógvan á Lakjuni) setir fram soljóðandi broytingaruppskot:

| | |
|---|---|
| **1)** Sum nýggj § 3, stk. 4 verður sett: | **1)** Som ny § 3, stk. 4 sættes: |
| "Stuðulin verður bert latin fyri landingar í Føroyum. Landsstýrið ásetir í kunngerð, ið krevur góðkenning av fiskivinnunevnd løg- | "Tilskuddet ydes kun for landinger på Færøerne. Landsstyret fastsætter ved bekendtgørelse, der skal godkendes af lagtingets fiskeriud- |

tingsins, hvussu stuðulin verður lækkaður fyri teir túrar, tá landað verður uttanlands."

2) Sum nýggj § 3, stk. 5 verður sett:
"Onnur treyt fyri at fáa stuðul er, at í minsta lagi 33% av veiðuni hjá fiskifarinum verður seld á uppboðssølu, sum landsstýrið hevur góðkent."

valg, hvorledes tilskuddet reduceres for de ture, hvor fangsten er afsat i udenlandsk havn."

2) Som ny § 3, stk. 5 sættes:
"Anden betingelse for at erholde tilskud er, at mindst 33% af skibets fangst sælges på auktion, der er godkendt af landsstyret."

# 82. Útskriving av nývali

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Tingið samtykkir, at álagt verður løgmanni at skriva út nýval beinanvegin.

**Viðmerkingar:**

Dómur fall í málinum um Heygadrang tann 13. januar. Teir 4 ákærdu vórðu allir fríkendir. Hetta hendi hóast tað greitt stendur í lógini, at eginpeningurin skal vera 10%, tá ið landskassin luttekur í fíggingini. Dómurin sigur greitt, at politiska valdið hevur verið vitandi um viðurskiftini, og at svik sostatt ikki er framt móti landskassanum av teimum fýra ákærdu. Eisini sigur dómurin greitt, at lógarinnar bókstavur ikki hevur verið hildin. Sostatt bendir alt á, at talan er um politiska og umsitingarliga líkasælu.

Henda líkasæla hevur kostað føroyska skattaborgarunum fleiri hundrað milliónir kr. í effektivum veðhaldum. Hetta hevur eisini ført við sær, at vælferðin hjá føroysku borgarunum hevur fingið eitt dyggiligt bakkast. Tann vánaliga umrøðan og dómurin í Heygadrangsmálinum hevur oyðilagt umdømi føroyinga uttanlands. Atburður tingmanna og landsstýrismanna hevur gjørt kreditvirði landsins munandi skaða og fer í mong ár at hava negativar avleiðingar fyri samfelagið.

Tað einasta, sum kann bøta um støðuna og forða fyri, at umdømi okkara versnar, er nýval. Føroya fólk eigur at sleppa at fella tann avgerandi dómin yvir teir fólkavaldu. Fólkið má avgera, hvørjir politikkarar skulu sleppa at halda fram í starvi.

Í Danmark legði forsætismálaráðharrin frá sær, tí hann visti meira um Tamilmálið, enn hann alment hevði boðað frá. Búskapar- og skattamálaráðharrin legði frá sær, tí at skeivar upplýsingar vóru í bókhaldinum. Danskir fólkatingslimir hava lagt frá sær fyri minni. Føroyska tingmanningin hevur nú høvið at prógva, at moralur og ábyrgdarkensla enn finst á Føroya løgtingi. Tað er ein sjálvfylgja, at tað eigur at fáa avleiðingar í Føroyum, tá ið politiska umsitingin ikki heldur seg til lógarinnar bókstav. Eitt nýval er einasti háttur at taka avleiðingarnar fult út.

Við hesum viðmerkingum leggur Sambandsflokkurin soljóðandi uppskot fram á ting.

# 83. Forðing fyri, at ognarskattur til pensjónistar og aðrar borgarar verður settur í verk her á landi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrinum alt fyri eitt at taka neyðug stig til, at inntøkuútrokningin fyri frían bústað hjá pensjónistum ikki kemur at ávirka pensiónina.

**Viðmerkingar:**

Tað kløkkaði helst øll og ikki minst teir 7000 pensjónistarnar, tá tað fyri døgum síðan frættist, hvørjar ætlanir landsstýrið hevði fyri at fáa nakrar krónur afturat í landskassan.

Í samband við skriv sent úr landsstýrinum til Almannastovuna eru nú boð givin um, at broyta upphæddina fyri frían bústað hjá pensjónistum.

Hesi boð hava við sær, at pensjónstur yvir 67 ár, ið býr í 120 m² stórum húsum og skuldin í húsinum er minni enn 50.000 kr., kemur at missa 700 kr. um mánaðin ella 8.400 kr. um árið.

Er talan um hjún yvir 67 ár lækkar pensjónin við 560 kr. um mánaðin ella 6.720 kr. um árið.

Pensjónistur yngri enn 67 ár kemur at missa uppaftur meira. Umframt at grundupphæddin í pensjónini minkar við 800 kr. um mánaðin, kemur hann at missa nærum alla pensjónsviðbótina.

Sostatt kemur pensjónistur undir 67 ár, ið býr í 120 m² húsum og har skuldin er minni enn 50.000 kr., at missa heilar 1500 kr. um mánaðin ella heilar 18.000 kr. um árið.

Grundgevingarnar fyri hesi broyting sigast úr landsstýrinum at vera, at hetta verður gjørt eftir kravi frá danska Almannaráðnum, og um ikki hesar broytingar verða gjørdar, so verður inntøkuútrokningin mótroknað í ríkisstuðlinum til Føroyar.

At landsstýrið hevur sent hesi boð til Almannastovuna at broyta upphæddina fyri frían bústað hjá pensjónistum, og at hetta kemur at ávirka inntøkugrundarlag pensjónistanna, so má ásannast, at ognarskattur her á landi er vorðin veruleiki og

pensjónistarnir eru teir, sum fyrst komu at merkja henda steinin oman á byrðuni. Umberingar sum, at hetta verður gjørt eftir direktivi úr danska almannaráðnum og at soleiðis er skipanin í Danmark, hjálpir einki teim føroysku pensjónistunum - og er als eingin uggi til teirra.

Einasta hjálp og uggi til pensjónistarnar í hesum máli er stutt sagt, at henda skilaleysa ætlan landsstýrisins verður steðgað!

Ótrúligt, at landsstýrið í hesum døgum, har so at siga allar útreiðslurnar hjá pensjónistum - eins væl hjá øðrum borgarum - eru hækkaðar (el, olja, heilivágur, mjólk, breyð o.s.fr.) loyvir sær bert at hugsa um tað, sum teir nú hava givið boð um, skal setast í verk. Her kann ein av góðum grundum spyrja, um landsstýrið als ouga føling hevur við, hvat rørist í fólkinum og hvussu føroyingurin, íroknað pensjónistarnir, hava tað í hesum torføru tíðum.

Øllum kunnugt er landskassin fíggjarliga illa fyri, men at fara soleiðis eftir pensjónistunum er átaluvert og má sigast at vera at fara um har, ið garðurin er lægstur.

Havast skal í huga, at tey sum í dag eru pensjónistar, hava víst nøgd og sparsemi, kent til strev og stríð og av sonnum eru tað tey, ið hava lagt lunnar undir vælferðarsamfelagið Føroyar. Tí hava tey eisini aðra tøkk frá landsins myndugleika uppiborna - enn at fáa lagdan stein oman á byrðu við ognarskatti.

Heilt burturvið er tað eisini, at sparsemi og tað at hava niðurgoldið skuld í egnum sethúsum, nú skal koma aftur um brekku og í ólukku mát ávirkað pensjónsupphæddina, ið als ikki er ov stór frammanundan.

Verður henda ætlan landsstýrisins ikki steðgað, so er bert spurningur um tíð, inntil ognarskattur fyri aðrar bólkar í samfelagnum verður settur í verk - og tað tá av góðum grundum, tí logiski spurningurin vil tá vera: Hví bert pensjónistar - hví ikki eisini onnur?!

Her skal eisini havast í huga, at í eini tíð, har landskassin er í støðugari peninganeyð, er stórur vandi fyri, at politiski "ognarskatt-hugburðurin" av sonnum vinnur frama.

Tess meiri neyðugt er tað tí nú, at steðga ætlanum landsstýrisins og verður uppskotið lagt fram í tí vón, at tað finst meiriluti her á tingi fyri at forða hesum ætlanum.

# Álit

## í

*Løgtingsmáli nr. 83/1992: Forðing fyri, at ognarskattur til pensjónistar og aðrar borgarar verður settur í verk her á landi.*

Málið er lagt fram av Tordi J. Niclasen, løgtingsmanni, tann 20. januar 1993 og eftir 1. viðgerð 29. januar beint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur havt fund við landsstýrismannin í heilsumálum og fingið upplýsingar um málið.

Tann 26. november gjørdu danska almannamálaráðið og Føroya landsstýri avtalu um at ájourføra nakrar reglugerðir í føroyska almannaverkinum. Millum hesar var áseting av virði í egnum bústaði, sum skuldi verða ásett áðrenn 1. januar 1993. Henda upphædd hevur síðan 1959 verið uml. kr. 300.-. Henda upphædd hevði so lítla ávirkan, at hon varð tikin úr skipanini mitt í 1970-árunum, tá teldur yvirtóku útrokningarnar.

5. januar ásetti landsstýrið so upphæddir í skundi, sum vóru heilt órímiligar og førdu til mikla øsing. Hesi boð vórðu seinni afturtikin, og enn eru ongar nýggjar upphæddir ásettar. Síðan tá er 1. februar farin aftur um, og danska stjórnin og Føroya landsstýri hava gjørt avtalu um samráðingar um framtíðar stuðulsveitan til Føroya.

Í hesum sambandi er ætlanin at endurskoða almannalóggávuna tillagaða føroyskum viðurskiftum. Til hetta er hent, er ætlanin at seta hesa bústaðarupphæddina til null.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jørgen Niclasen, Jacob Lindenskov, Jørgen Thomsen) tekur ikki undir við málinum vísandi til omanfyrinevndu viðmerkingar og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Lasse Klein og Eilif Samuelsen) tekur undir við uppskotinum og mælir til at samtykkja tað.

# 84. Ongar broytingar, sum minka um fólkapensjónsupphæddina

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum ongar broytingar at seta í verk, sum minka um pensjónsupphæddina hjá fólkapensjónistum vegna egna íbúð, at at taka upp samráðingar við danir, sum tryggja pensjónistunum, at teir sleppa undan eigindómsskatti og øllum tí, sum kallast kann ognarskattur, á sama hátt sum øðrum føroyingum.

**Viðmerkingar:**

Boðini frá Almannadeildini í Tinganesi um at hækka virðið av egnum bústaði hjá fólkapensjónistum, sum búgva í egnum húsum við ongum ella bara lítlum láni, hava av góðum grundum loypt ótta á fólk.

Stakur pensjónistur kann við hækkingini koma at fáa upp til 8.400 kr. minni útgoldið um árið, sum er ógvuliga nógv, tá ið havt verður í huga, at fólkapensjónin er ikki meir enn 50 túsund kr. um árið og knappliga tað.

Heldur skuldi verið farið hin vegin og hækkað pensjónsupphæddina, tí at tað er vorðið so nógv dýrari at liva í Føroyum tey seinastu árini. Lógin um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn kann verða avtikin móti, at pensjónsupphæddin hækkar tilsvarandi, og ger tað beinanvegin. Tað vil samstundis lætta um bæði hjá løntakarum og arbeiðsgevarum, sum hava ov mikið av gjøldum og avgjøldum at rinda.

Órímiligt kennist tað, at lagt skal verða so eftir pensjónistunum, fyrst við at leggja skatt á teir av nýggjum, síðan at taka pensjónina frá teimum, ið eru millum 67 og 70 ár og hava aðra inntøku og nú leggja ein eigindómsskatt, ið kallast kann eitt slag av ognarskatti á pensjónistarnar við at hækka virðið av egnum bústaði og harvið inntøkuna hjá pensjónistunum.

Í Føroyum hava vit hvørki eigindómsskatt ella ognarskatt og skulu heldur ikki hava tað. Tað eigur eisini at vera galdandi fyri pensjónistar.

Tí verður hetta uppskot lagt fyri tingið.

Vit gjalda jú 50% av pensjónini og eiga tí eisini at hava eitt orð at skula sagt tí viðvíkjandi.

# Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 84/1992: Ongar broytingar, sum minka um fólkapensjónsupphæddina.*

Málið er lagt fram av Kristiliga fólkaflokkinum Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 20. januar 1993 og eftir 1. viðgerð 29. januar beint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur havt fund við landsstýrismannin í heilsumálum og fingið upplýsing um málið og vísir til viðmerkingar í løgtingsmáli nr. 83/1992: Forðing fyri, at ognarskattur til pensjónistar og aðrar borgarar verður settur í verk her á landi.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jørgen Niclasen, Jacob Lindenskov og Jørgen Thomsen) tekur ikki undir við uppskotinum.

Minnilutin (Lasse Klein og Eilif Samuelsen) tekur undir við uppskotinum og mælir til at samtykkja tað.

# 85. Løgtingslóg um ásetan av líkningarprosentinum fyri kommunu- og kirkjuskatt og barnafrádrátt fyri 1993

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um ásetan av líkningarprosentinum fyri kommunu- og kirkjuskatt og barnafrádrátt fyri 1993.*

*lagtingslov om fastsættelse af ligningsprosenten for kommunne- og kirkeskat og børnefradrag for 1993.*

**§ 1.**

Bý- og bygdaráðunum verður heimilað, í seinasta lagi 14 dagar eftir, at hendan lógin er komin í gildi, at broyta galdandi líkningarprosent fyri kommunu- og kirkjuskatt og barnafrádrátt fyri inntøkuárið 1993, og verður tað tá ásetta líkningarprosentið og barnafrádráttur galdandi fyri alt almanakkaárið 1993.

**§ 1.**

By- og bygderådene bemyndiges til, senest 14 dage efter, at denne lov er trådt i kraft, at ændre gældende ligningsprosent for kommune- og kirkeskat og børnefradrag for indtægtsåret 1993, og er det således fastsatte ligningsprosent og børnefradrag gældende for hele kalenderåret 1993.

**§ 2.**

Hendan lógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

**Viðmerkingar:**

Fleiri kommunur hava gjørt vart við, at soleiðis, sum fíggjarviðurskiftini eru hjá kommununum, er líkningarprosentið fyri kommunu- og kirkjuskatt fyri 1993 ov lágt ásett av undanfarna bý- ella bygdaráði, og at tær ikki kunnu liva við hesum.

Tað er ein spurningur, sum kann verða tikin upp til umhugsanar seinni, um eitt fráfarandi bý- ella bygdaráð eigur at samtykkja ársfíggjarætlanina og áseta líkningarprosentið fyri kommununa galdandi fyri eitt inntøkuár, tá tað er farið frá, ella um hetta eigur at verða gjørt av tí nývalda bý- ella bygdaráðnum, sum tekur við.

Samsvar er ikki ímillum samtíðarskattalógina og kommunulógina á hesum øki. Eftir §§ 47 og 59 í samtíðarskattalógini skulu bý- og bygdaráðini hava ásett líkningarprosentið fyri kommunu- og kirkjuskatt í seinasta lagi 1. oktober, sum galdandi fyri inntøkuárið eftir. Skattaprosentið verður ásett við ársfíggjarætlanini sum grundarlagi. Um skattaprosentið ikki er ásett í seinasta lagi 1. oktober - hendan freistin hevur tó verið toygd nakað - so kann landsstýrið eftir § 59 í samtíðarskattalógini áseta prosentið, sum tað seinast var ásett.

Tað av bý- ella bygdaráðnum - ella landsstýrinum - ásetta skattaprosentið, kann ikki verða broytt, hvørki í inntøkuárinum, tað er galdandi fyri, ella seinni undir endaligu líkningini. Men eftir § 29 í kommunulógini skulu kommunurnar ikki hava samtykt ársfíggjarætlanina fyrr enn í seinasta lagi 20. desember, sum galdandi fyri árið eftir. Hetta merkir í praksis, at í fleiri førum verður kommunu- og kirkjuskattaprosentið ásett, áðrenn ársfíggjarætlanin er samtykt, tí nógvar kommunur hava onga fíggjarætlan gjørt, tá freistin fyri at áseta skattaprosentið er úti 1. oktober.

Tað eigur framvegis at vera soleiðis, at líkningarprosentið fyri kommunu- og kirkjuskatt, við ársfíggjarætlanini hjá kommununi sum grundarlagi, verður ásett fyri eitt heilt inntøkuár, og at tað verður ásett í árinum frammanundan inntøkuárinum, tað er galdandi fyri. Broytingar eiga at verða gjørdar í lóggávuni, soleiðis at meira samsvar verður ímillum kommunulógina og skattalógina á hesum øki.

Um frammanfyrinevndu lógarbroytingar verða gjørdar, koma tær sjálvandi onga ávirkan at hava á tað kommunuskattaprosentið, sum nú er galdandi fyri 1993. Men landsstýrið metir, at tað er avgerandi neyðugt, at tey bý- og bygdaráð, sum tóku við 1. januar í ár, eisini fáa møguleika at broyta galdandi kommunuskattaprosent fyri 1993.

Landsstýrið ásannar, at tað er principielt óheppið at lóggeva um, at farið kann vera inn í inntøkuárið at áseta skattaprosentið fyri sama inntøkuár, galdandi fyri alt árið, tí lógin skal tá nýtast afturvirkandi. Men soleiðis, sum fíggjarstøðan hjá kommununum er, slepst ikki undan hesum í ár, og enn er lítið liðið av árinum, og stutt freist verður sett fyri, nær nývaldu bý- og bygdaráðini skulu hava samtykt at broyta líkningarprosentið.

Skotið verður tí upp við serstakari lóg, at heimila bý- og bygdaráðunum í inntøkuárinum 1993 at broyta galdandi kommunu- og kirkjuskattaprosent og barnafrádrátt fyri 1993, og at hetta skal verða gjørt í seinasta lagi 14 dagar eftir, at lógin er komin í gildi.

Lógin hevur eftir sínum innihaldi bert gildi fyri ásetan av skattaprosentinum fyri inntøkuárið 1993.

Lógin hevur við sær, at freistin í § 59 í samtíðarskattalógini fyri, nær líkningarprosentið fyri kommunu- og kirkjuskatt fyri eitt inntøkuár skal verða ásett - nevniliga 1. oktober, sum galdandi fyri komandi inntøkuár, smbr. eisini § 47, stk. 1

í nevndu lóg - verður suspenderað fyri ásetan av líkningarprosentinum fyri inntøkuárið 1993, men verður annars verandi í gildi.

Eftir lógaruppskotinum kunnu galdandi líkningarprosent verða broytt av bý- og bygdaráðunum - ikki av landsstýrinum - innanfyri ta freist, ið ásett er í uppskotinum. Um eingin bý- ella bygdaráðssamtykt um broytan av kommunuskattaprosentinum verður gjørd innan hesa freist, verður tað líkningarprosent, sum var galdandi, tá lógin fekk gildi, framvegis galdandi.

Somu viðmerkingar eru galdandi fyri barnafrádráttin, sum bý- og bygdaráðini eftir § 46 í skattalógini kunnu avgera, kann verða í útrokningini av kommunuskattinum.

Av omanfyrinevndu grundum hevur tað skund, at lógin verður sett í gildi. Heitt verður tí á tingið at bera skjótt at, við at viðgera málið.

# 86. Útróðrarmenn og Arbeiðsloysistryggingin

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Landsstýrinum verður álagt annaðhvørt at sleppa útróðrarmonnum undan at gjalda í Arbeiðsloysisgrunnin ella beinavegin at gera reglur, sum veita útróðrarmonnum somu sømdir viðvíkjandi arbeiðsloysi, sum tey hava, ið taka ímóti og virka fiskin uppi á landi.

**Viðmerkingar:**

Lógin um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing frá 10. mars 1992 fór at virka 1. august í fjør.

Greiðar reglur eru settar fyri tey, ið arbeiða á flaka- og fiskavirkjum. Hesar reglur tryggja teimum 32 tíma arbeiðsviku og stuðul frá Arbeiðsloysisgrunninum, tá ið einki arbeiði er, 70% av teirri upphædd, sum goldin verður fyri 40 tíma arbeiðsviku, íroknað frítíðarløn eftir galdandi lønarsáttmála, roknað einaferð um vikuna frá og við 9. arbeiðsloysistíma.

Øll skuldu verið líka fyri lógini.

Teir, ið veiða fiskin og avreiða hann til fiskavirkini, skuldu fingið somu sømdir, sum tey, ið arbeiða hann uppi á landi.

Útróðrarmenn fáa sum er næstan ongantíð úr Arbeiðsloysisgrunninum. Serligar reglur eru gjørdar fyri teir í kunngerð frá 31. juli 1992, sum sigur, at teir verða roknaðir fyri arbeiðsleysir, tá ið veiðiloyvið er tikið aftur, útróðrarfarið ella partur teirra í bátinum seldur, farið á húsagang, ella farið verður ikki aftur við sama báti í 1 ár (tó 2 mánaðir fyr útróðrarmenn, ið ongan part eiga í bátinum).

Útróðrarmenn noyðast at gjalda inn í arbeiðsloysisgrunnin sum øll onnur, 2% av allari inntøku. Eiga teir sjálvir bátin, skulu teir harumframt gjalda onnur 2% sum arbeiðsgevarar hjá sær sjálvum.

Hetta gjald hevur verið tikið frá teimum, uttan at teir verða eftirspurdir ella hava fingið nakað skjal um tað.

Misnøgdin er stór um tað. Arbeiðsloysisskipanin hevur sent út eitt kunningarskriv og biðið bátseigarar og aðrar arbeiðsgevarar um fulltrú til at flyta hetta gjald, sum ásett í lógini um arbeiðsloysisgrunnin. Men tað er óvist, um útróðrarmenn og bátseigarar vilja geva grunninum hesa heimild, tá ið arbeiðsloysisskipanin í veruleikanum tykist ikki at vera galdandi fyri teir, hvat ið útgjalding viðvíkur.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 86/1992: Útróðrarmenn og Arbeiðsloysistryggingin.*

Málið er lagt fram av Kristiliga fólkaflokkinum, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 21. januar 1993 og eftir 1. viðgerð 11. februar 1993 beint í arbeiðaramálanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 29. apríl 1993 og var semja í nevndini um at sýna málinum vælvild og at mæla til, at neyðugar lógarbroytingar verða gjørdar soleiðis, at ætlanirnar í fyriliggjandi uppskoti verða framdar og at landsstýrið fær høvið til at kanna málið saman við avvarðandi stovni og setir tí fram soljóðandi:

## Uppskot

## til

## samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at kanna málið og taka upp samband við nevndina fyri arbeiðsloysistryggingina, um møguligar broytingar skulu gerast, og síðani at

leggja fyri tingið møguligar neyðugar broytingar í lógini. Dentur verður at leggja á, at um neyðugt má skipanin broytast soleiðis at tey, sum rinda inn til grunnin, fáa sama rætt til útgjald.

# 87. Íløgustuðul og fígging til alivinnuna

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Landsstýrinum verður álagt at kanna møguleikarnar fyri íløgustuðuli og koma við uppskoti um fígging til alivinnuna, so at nóg mikið av smolti kann verða sett út í summar.

**Viðmerkingar:**

25% av tí samlaða útflutninginum í Føroyum átti alivinnan í 1992 móti 21% í 1991. Tað er fjóðra hvør útflutningskróna, sum kemur frá alivinnuni, laksur og sfl. Hagdeildin hevur hesi tøl fyri tey seinastu árini. Royktur laksur er tá ikki íroknaður:

| Ár | tons | kr. | Samlaði útfl. uttan skip |
|---|---|---|---|
| 1985 | 1.447 | 95,7 mió. | 1.833,7 mió. |
| 1987 | 3.668 | 263,3 - | 1.962,0 - |
| 1988 | 5.391 | 263,0 - | 2.064,8 - |
| 1989 | 8.194 | 327,8 - | 2.342,7 - |
| 1990 | 11.867 | 449,3 - | 2.313,6 - |
| 1991 | 16.168 | 554,0 - | 2.631,5 - |
| 1992 | 16.009 | 578,0 - | (2.400,0) - |

Alivinnan hevur ongan studning fingið frá landinum. Hon hevur tvørturímóti goldið nógvar milliónir í tolli, skatti og avgjøldum, har aðrar vinnur eru slopnar lættari.

Á fíggjarløgtingslógini fyri 1993 eru 18 mió. kr. settar av til "Tiltøk fyri alivinnuna" og 12 mió. til íløgur í lívfiskastøð í Skopun umframt 4,9 mió. til kynbótaarbeiðið við Áir og í Skopun.

Við "Tiltøk fyri alivinnuna" sigur landsstýrið seg í viðmerkingunum til fíggjarlógina hugsa um framleiðslufelag og afturkeypsskipan, sum Havbúnaðarfelagið hevur samtykt at fara undir.

Tað hevði munað væl meira og gerst uttan iva neyðugt, at landsstýrið fer inn í eina skipan við fløgustuðuli til alivinnuna, og saman við peningstovnunum roynir at finna fram til eina fígging fyri alifisk, so at tær góðu 5 mió. av smolti, sum eru í landinum, kunnu verða sett út í summar.

Pengar tróta bæði hjá bankunum og øðrum peningastovnum í landinum. Tað liggur á ljóði, at fígging er eingin til at seta út meir enn 1 til 2 mió. smolt.

Smoltstøðirnar vóru upprunaliga 16 í tali. Nú eru bara 13 eftir.

Sjógvalistøðirnar vóru upprunaliga 60 í tali, men í fjør settu bara 26 smolt út, 19 fingu ikki fígging til at seta smolt út av nýggjum, og noyðast tí at gevast, um eingin fígging fæst heldur í ár. Nakrar teirra eru longu givnar.

Yvirlitið er gjørt fyri tað, sum sett er út av smolti gjøgnum tey seinastu árini. Tað sær solciðis út:

| Ár | Smolt |
|---|---|
| 1987 | 3,6 mió. |
| 1988 | 4,6 - |
| 1989 | 5,1 - |
| 1990 | 6,8 - |
| 1991 | 8,5 - |
| 1992 | 4,6 - |
| 1993 | |

Verða ikki meira enn 2 mió. smolt sett út í summar, so kemur alivinnan út fyri eitt sovorðið bakkast, sum trupult verður at vinna á.

Tá verður minni av fiski, sum gevur minni av arbeiði í hesum arbeiðsloysistíðum, og tað verður minni at flyta út næsta ár.

Landsstýrið kann fáa vent gongdini við at veita einar 5 kr. fyri hvørt smoltið sum íløgustuðul á sama hátt, sum gjørt verður fyri aðrar vinnuhættir sum t.d. landbúnaðin, har ætlanin er at strika lán fyri 89,2 mió. kr.

Smoltið kostaði í fjør 14-16 kr. hvørt, og kundi prísurin fingist niður á 10-12 kr. við fløgustuðuli úr landskassanum, hjálpir tað væl um hjá sjógvalarum. Hóskandi treyt kundi verið, at smoltið ikki er fongt við álvarsamari sjúku.

Neyðugt verður eisini at finna fram til eina lagaliga fígging fyri alivinnuna, so at hon kann geva so nógv av sær sum møguligt, bæði til hitt einstaka húsarhaldið og til landshúsarhaldið.

Lønarútgjaldingarnar í alivinnuni fyri 1992 vóru 70 mió. kr. fyri uttan arbeiðið av alifiski uppi á landi, ella tilsamans einar 100 mió. kr.

15 tons verða mett at geva 1 arbeiðspláss. Eftir útflutta tonsatalinum er tá talan um meira enn 1000 arbeiðspláss.

Hesi kunnu gerast uppaftur fleiri, um vit kunnu halda talinum uppi á smolti, ið útsett verður, og heldur økja tað, enn at minka um tað.

Í Hetlandi sigst alivinnan at geva tað største búskaparliga íkastið, og í Noregi gevur alivinnan meira av sær enn virði á landaðum fiski.

Samlaða laksatalið í heiminum er smb. Norsk Fiskeopdræt nr. 8-1992 so stórt sum 1150 tús. tons, harav Alaska hevur tað hægsta talið upp á 330 tús. tons, Japan 260 tús., Sovjet 250 tús. og Noreg 160 tús.

Hesi tølini eru fyri 1991. Talið hjá norðmonnum fyri 1992 er 10 tús. tons størri, tilsamans 170 tús. tons, ið útflutt eru.

Verður farið undir FO (framleiðsluskipan) saman við teimum stóru laksalondunum, kann tað lættliga verða kravdur ein niðurskurður, sum rakar okkum meint, um vit longu nú fara munandi niður, og aftur tá.

## Álit

### í

*løgtingsmáli nr. 87/1992: Íløgustuðul til fígging til alivinnuna.*

Málið er lagt fram av Kristiliga fólkaflokkinum, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 26. januar 1993 og eftir 1. viðgerð 11. februar 1993 beint í ídnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið. Nevndin vísir á løgtingsmál nr. 167/1992: Íløgustuðul til alivinnuna, sum varð lagt fram av undanfarna landsstýri, og samtykt við 3. viðgerð í løgtinginum tann 1. apríl 1993. Nevndin tekur tí ikki undir við uppskotinum, og setir einki uppskot fram.

# 88. Norðurlendskur sáttmáli um útbúgvingarfelagsskap innan gymnasialar útbúgvingar

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið góðkennir, at norðurlendski sáttmálin frá 4. mars 1992 um útbúgvingarfelagsskap innan gymnasialar útbúgvingar í norðurlondum verður lýstur at galda í Føroyum.

**Viðmerkingar:**

Danmark hevur góðkent sáttmálan, men fyrivarni er tikið viðvíkjandi Føroyum.

Danir hava sent føroyingum sáttmálan, og biðið um støðutakan sambært artikkul 9, stk. 2.

Sáttmálin snýr seg m.a. um, at Norðurlond økja møguleikarnar fyri, at lesandi í einum norrønum landi kunnu fáa útbúgving og taka prógv í einum øðrum norrønum landi. Fáast skal til vega sínámillum viðurkenning av prógvtøkum, partsprógvtøkum og øðrum námsligum avrikum.

Londini átaka sær sostatt sínámillum at geva lesandi, sum búgva í einum øðrum norrønum landi, atgongd til teirra almennu og vinnulívsførleikagevandi gymnasialu útbúgvingar við somu treytum, sum ríkisborgarar í viðkomandi landi.

Londini og skúlamyndugleikar teirra taka ikki gjald frá hvørjum øðrum fyri ta undirvísing v.m., sum verður veitt útbúgvingarsøkjandi frá øðrum norrønum londum, sum fylgja lógarfestari útbúgving.

Sí annars sáttmálan í síni heild.

Fyri Føroyar fær sáttmálin ikki gildi fyrrenn 30 dagar aftaná, at danska stjórnin hevur boðað finska uttanríkismálaráðnum frá, at Føroya Landsstýri hevur sagt frá, at sáttmálin skal galda fyri Føroyar.

Landsstýrið hevur sent Landsskúlafyrisitingini sáttmálan til ummælis. Landsskúlafyrisitingin hevur mælt til, at sáttmálin verður settur í gildi fyri Føroyar.

**Álit**

**í**

*Løgtingsmáli nr. 88/1992: Norðurlendskur sáttmáli um útbúgvingarfelagsskap innan gymnasialar útbúgvingar.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 29. januar 1993 og eftir 1. viðgerð 10. februar beint í mentannar- og skúlanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og er samd um at mæla tinginum til at samtykkja tað.

# 89. Broyting í løgtingslóg um trygging

**Uppskot**

**til**

*Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um trygging.*

*Lagtingslov om ændring i lagtingslov om forsikringsvirksomhed.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 24 frá 28. mars 1956 um trygging verður gjørd henda broyting:

Í § 1, stk. 1 verður aftan á orðini "sum nevndar eru í §§ 2, 3 og 4," sett:

"umframt skip, ið eru skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni,".

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 24 af 28. marts 1956 om forsikringsvirksomhed foretages følgende ændring:

I § 1, stk. 1 indsættes efter ordene "der er nævnt i §§ 2, 3 og 4,":

"foruden skibe, der er registreret i Føroysk Altjóða Skipaskrá,".

**§ 2.**

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

**Viðmerkingar:**

Aftan á at FAS-skipanin nú hevur virkað í eina tíð, hevur tað víst seg, at monopolstøðan hjá føroysku tryggingini hevur verið ein forðing fyri, at skipanin kann

virka sum ætlað við at fáa útlendsk reiðaríir hendavegin. Koma skip í FAS-skipanina, missa reiðaríini eina tryggingarbonusskipan, sum tey ikki kunnu fáa tilsvarandi frá Tryggingarsambandinum.

Eisini stinga aðrir trupulleikar seg upp í samband við endurtrygging av útlendskum skipum í FAS-skipanini, tí tá hesi verða endurtryggjað uttanlands, koma tær treytir, sum endurtryggingarfelagið ásetir, at galda, m.a. at tey skulu hava føroyskan skipara, vera føroysk ogn og hava føroyskan rakstur.

Landsstýrið mælir løgtinginum til at samtykkja broyting í tryggingarlógini, soleiðis sum skotið er upp.

## Álit

í

*løgtingsmáli nr. 89/1992: Broyting í løgtingslóg um trygging.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 29. januar 1993 og eftir 1. viðgerð 10. februar 1993 beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við Jens P. Arge, stjóra fyri "Tryggingarsambandið Føroyar", ið kunnaði nevndina um viðurskiftini í sambandi við FAS-skipanina og galdandi tryggingarreglur.

Eisini hevur nevndin havt fund við Tummas Arabo, landsstýrismann í tryggingarmálum, ið lýsti málið og mælti til at fremja uppskot landsstýrisins óbroytt.

Meirilutin (Mikkjal Sørensen, Bjarni Djurholm, Eliesar Arge og Signar Hansen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Heðin Mortensen) tekur ikki undir við uppskotinum. Minnilutin mælir til, at einkarrætturin hjá Tryggingarsambandinum verður tikin av.

Tí verður soljóðandi uppskot sett fram:

## Uppskot

## til

## samtyktar

Álagt verður landsstýrinum í Ólavsøkutingsetuni 1993 at leggja fyri løgtingið uppskot um at taka av einkarrættin hjá Tryggingarsambandinum.

# 90. Løgtingslóg um uppboðssølu av fiski

**uppskot**

**til**

*løgtingslóg um almenna uppboðssølu av fiski.*

*lagtingslov om offentlig auktion for fisk.*

**§ 1.**

Bert persónar góðkendir av landsstýrinum kunnu halda almenna uppboðssølu av fiski.

**Stk. 2.** Landsstýrið kann í kunngerð áseta nærri reglur fyri virkseminum hjá uppboðssøluhaldarum, umfataðir av hesi lóg, og keyps- og sølutreytir á uppboðssøluni.

**Stk. 3.** Um uppboðssøluhaldarin ikki heldur reglur, gjørdar við heimild í hesi lóg ella treytirnar í góðkenningini, kann landsstýrið taka góðkenningina aftur.

**§ 1.**

Offentlig auktion af fisk må kun afholdes af personer, som landsstyret har godkendt.

**Stk. 2.** Landsstyret kan i bekendtgørelse fastsætte nærmere regler for de auktionsholderes virksomhed, der er omfattet af denne lov, og om køb- og salgsbetingelser på auktionen.

**Stk. 3.** Såfremt auktionsholderen ikke overholder regler, udfærdiget med hjemmel i denne lov eller vilkårene i godkendelsen, kan landsstyret inddrage godkendelsen.

**§ 2.**

Á uppboðssøluni kunnu øll fiskasløg seljast.

**Stk. 2.** Bert tey, sum eru búsett í Føroyum, ella feløg, skrásett í Føroyum, kunnu bjóða á uppboðssøluni.

**§ 2.**

Alle fiskearter kan sælges på auktionen.

**Stk. 2.** Kun personer, der er bosiddende på Færøerne, eller selskaber, registreret på Færøerne, kan afgive bud på auktionen.

**§ 3.**

Uttan so er, at strangari revsing er uppiborin eftir aðrari lóggávu, verður sektaður hann, ið ikki heldur § 1, stk. 1, § 2, stk. 2 ella treytirnar í góðkenningini, jvb. § 1.

**§ 3.**

Medmindre strengere straf er forskyldt efter den øvrige lovgivning, straffes med bøde den, der ikke overholder § 1 stk. 1, § 2, stk. 2, eller vilkårene i godkendelsen, jfr. § 1.

**Stk. 2.** Í forskriftum, sum eru gjørdar við heimild í hesi lóg, kunnu gerast reglur um sekting fyri brot á hesar forskriftir.

**Stk. 3.** Fyri brot á hesa lóg, ið verða gjørd av partafeløgum, lutafeløgum og líknandi, kann bótaábyrgd verða áløgd felagnum sum slíkum.

**§ 4.**

Henda lógin fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Stk. 2.** I forskrifter, som udstedes i medfør af denne lov, kan fastsættes straf af bøde for overtrædelse af disse forskrifter.

**Stk. 3.** For overtrædelser, der begås af aktieselskaber, andelsselskaber eller lignende, kan der pålægges selskabet som sådant ansvar.

**§ 4.**

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

**Viðmerkingar:**

Bert persónar, sum danska løgmálaráðið hevur góðkent samb. "Anordning nr. 224 af 5. oktober 1936 om offentlig auktion ved auktionsledere" kunnu sum høvuðsregla halda sjálvbodna, almenna uppboðssølu.

Tað er ivasamt, um hesar reglur eru galdandi fyri uppboðssølu av fiski. Tað verður tó hildið at vera óheppið, at danska løgmálaráðið skal góðkenna uppboðssøluhaldarar innan fiskivinnuøkið, sum annars er yvirtikið mál, og verður skotið upp, at góðkenningin skal gevast av landsstýrinum.

Reglurnar í hesi lóg vóru í høvuðsheitum innihildnar sum ein partur av løgtingsmáli nr. 22/1992: Løgtingslóg um uppboðssølu av fiski, men vóru ikki samtyktar, við tað at lógin datt niðurfyri í síni heild. Tað hevur tó víst seg, at brúk er fyri hesum reglum, nú ætlanir eru um at seta á stovn sjálvbodnar, almennar uppboðssølur av fiski, og vera tær tí settar fram av nýggjum.

Góðkenningin sum uppboðssøluhaldari verður givin persónliga. Felagið, sum rekur uppboðssøluna og uppboðssøluhølið má sjálvandi lúka onnur krøv í lóggávuni, so sum vinnulóggávu, góðkenning eftir matvørulógini o.s.fr.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 90/1992: Løgtingslóg um uppboðssølu av fiski.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 29. januar 1993 og eftir 1. viðgerð 3. februar 1993 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og tekur sum heild undir við tí. Eftir uppskotinum frá landsstýrinum verður í § 1, stk. 2 sagt, at landsstýrið í kunngerð kann

áseta nærri reglur fyri virkseminum hjá uppboðssøluhaldarum, umfataðir av hesi lóg, og keyps- og sølutreytir á uppboðssøluni. Nevndin mælir til, at hesar kunngerðir verða lagdar fyri fiskivinnunevndina til góðkenningar, og setir samsvarandi hesum fram broytingaruppskot.

Eftir uppskotinum kunnu øll fiskasløg seljast á uppboðssøluni, men nevndin mælir til, at eisini fiskaúrdráttir (t.d. rogn og livur) og skeljafiskur kunnu seljast á uppboðssøluni, og mælir tí til at broyta § 2 samsvarandi hesum.

Við hesum broytingum mælir ein samd fiskivinnunevnd løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins og setir samsvarandi hesum fram soljóðandi:

## Broytingaruppskot

## til

## uppskot landsstýrisins


1) Í § 1, stk. 2 verður skoytt uppí:
"Henda kunngerð skal góðkennast av løgtingsins fiskivinnunevnd."

2) § 2, stk. 1 verður soljóðandi:
"Á uppboðssøluni kunnu øll fiskasløg, fiskaúrdráttir og onnur sjódýr seljast."

1) I § 1, stk. 2 tilføjes:
"Denne bekendtgørelse skal godkendes af lagtingets fiskeriudvalg."


2) § 2, stk. 1 affattes således:
"Alle fiskearter, fiskerivarer og andre marine dyrearter kan sælges på auktionen."


# RED: 10 X




Nasjonalbiblioteket


**Nasjonalbiblioteket**
National Library of Norway
Rana Division
N-8607 Mo i Rana
Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12 12 22





RED: 10 X



Nasjonalbiblioteket

**Nasjonalbiblioteket**
National Library of Norway
Rana Division
N-8607 Mo i Rana
Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12 12 22

# LØGTINGS-TIDINDI

# 1992

# 91. Løgtingslóg um Strandferðslu Landsins

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um Strandferðslu Landsins.*

**§ 1.**

Strandferðsla Landsins (SL) er landsfyritøka undir Føroya Landsstýri.

**Stk. 2.** Setningur Strandferðslu Landsins er:

1) at vera tænastuveitandi stovnur til tess at nøkta partar av landsins tørvi á innlendis flutningi,
2) í so stóran mun sum gjørligt at verða rikin eftir handilsligum sjónarmiðum.

**§ 2.**

Strandferðslan kann sum landsfyritøka taka upp lán treytað av góðkenning landsstýrisins og Fíggjarnevnd Løgtingsins.

**§ 3.**

Strandferðslan hevur sín roknskap, sum løggildur grannskoðari grannskoðar og sum síðani verður at góðkenna eftir reglunum fyri almennar roknskapir.

**Stk. 2.** Fíggjar-, rakstrar- og íløguætlan fyri strandferðsluna verður løgd á hvørjum ári og skal latast landsstýrinum í seinasta lagi 15. mai árið fyri.

*lagtingslov om Strandferðsla Landsins.*

**§ 1.**

Strandferðsla Landsins (SL) er landsvirksomhed under Færøernes Landsstyre.

**Stk. 2.** Strandferðsla Landsins har til formål:

1) serviceydende virksomhed, der skal tilfredsstille dele af landets behov for indenlands transport,
2) i så stort omfang som muligt at drives efter kommercielle synspunkter.

**§ 2.**

Strandferðslan kan som landsvirksomhed optage lån. betinget af godkendelse fra landsstyret og lagtingets finansudvalg.

**§ 3.**

Strandferðslan fører sit regnskab, som skal revideres af autoriseret revisor og derefter godkendes efter reglerne for offentlige regnskaber.

**Stk. 2.** Finansierings-, drifts- og anlægsbudget for strandferðslan udfærdiges hvert år og skal være landsstyret i hænde senest 15. maj året før.

§ 4.

Landsstýrinum verður heimilað at stovna partafeløg at reka partar av virkseminum, sum strandferðslan nú rekur, og tekna neyðugan partapening í hesum feløgum.

§ 5.

Landsstýrinum verður heimilað við stovnan av teimum í § 4 nevndu feløgum, eftir góðkenning frá Fíggjarnevnd Løgtingsins, at lata partar av ognum strandferðslunnar sum heilt ella lutvíst inngjald fyri partapeningin, ið verður teknaður sambært § 4.

**Stk. 2.** Eins og partafeløgini taka á seg rættindi og skyldur strandferðslunnar, yvirtaka tey eisini tey aktiv og passiv, ið eru knýtt at tí virksemi, sum einstaka partafelagið yvirtekur.

§ 6.

Tey partafeløg, sum eru stovnað sambært hesi lóg, fáa rætt at nýta búmerki strandferðslunnar.

§ 7.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er lýst.

§ 4.

Landsstyret har hjemmel til at stifte aktieselskaber, at drive dele af virksomheden, som strandferðslan nu driver, og at tegne fornøden aktiekapital i disse selskaber.

§ 5.

Landsstyret har hjemmel i forbindelse med stiftelse af de i § 4 nævnte selskaber, efter godkendelse fra lagtingets finansudvalg, at lade dele af Strandferðslans ejendom som hel eller delvis indbetaling som aktiekapital, som tegnes i henhold til § 4.

**Stk. 2.** På samme måde som aktieselskaberne påtager sig rettigheder og forpligtelser hos strandferðslan, overtager disse også aktiver og passiver, som er tilknyttet den virksomhed, som det enkelte aktieselskab overtager.

§ 6.

De i henhold til denne lov stiftede aktieselskaber har ret til at anvende Strandferðslans bomærke.

§ 7.

Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

**Viðmerkingar:**

Landsstýrið hevur til tess at fáa betri innlit, størri gagn og betri tænastu burtur úr játtaða studninginum sett sær fyri at gera ávísar bygnaðar- og skynsemisbroytingar innan alment samferðslustovnarnar.

Landsstýrið hevur tí samtykt at leggja Samferðslustovuna (Bygdaleiðir) og Strandfaraskip Landsins saman í nýggjan stovn nevndan Strandferðsla Landsins.

Ein av orsøkunum til samanleggingina er tann, at tað var mett óheppið, at annar stovnurin gjørdi ferðaætlanina, sum hin stovnurin sigldi eftir, tó at fyrr

nevndi stovnurin ikki hevði ábyrgdina av fíggjarligu avleiðingunum hins scinni nevnda.

Strandferðsla Landsins skal sambært uppskotinum hava egnu fíggjar-, rakstrar- og íløguætlan á hvørjum ári, sum skal latast landsstýrinum í seinasta lagi 15. mai árið fyri. Hetta er í tráð við uppskot um leiðbeining til fíggjarlógarætlan, sum fíggjardeild landsstýrisins í løtuni arbeiðir við.

Sum landsfyritøka kann Strandferðslan upptaka lán treytað av góðkenning landsstýrisins og fíggjarnevnd løgtingsins.

Nú fíggjarliga rákið í samfelagnum broytist so nógv, hevur landsstýrið eisini sett sær fyri at raðfesta (prioritera) málsetningin fyri tí játtaða studninginum til almenna flutningstænastu.

Sum fremsta setning sín fer landsstýrið at veita eitt álítandi flutningssamband millum tær oyggjar, sum ikki eru samanbundnar við brúgv ella øðrum vegasambandi. Ætlan landsstýrisins er sostatt eisini í trongum tíðum at útvega neyðuga peningin, so ferðasambandið sjóvegis verður á eins høgum støði og higartil.

Ætlanin er somuleiðis at varðveita eitt rímiliga høgt tænastustøði, har tað snýr seg um kollektivan fólkaflutning á landi.

Nýggi stovnurin skal veita so góða tænastu sum gjørligt, tá talan er um farmaflutning bygdanna millum. Hinvegin ætlar landsstýrið ikki at nýta almennan studning til hesa tænastu, útoyggjamar kortini undantiknar.

Fyri at fáa greiðari skilnað millum rakstrarútreiðslumar av strandfaraskipunum og farmaflutningsvirkseminum er ætlanin at leggja hetta seinna liðið, t.e. lastbilar, trailarar, fraktavgreiðslur o.l. í eitt partafelag, sum í dagliga rakstri sínum skal svara hvørjum sítt.

Fleiri grundgevingar eru fyri hesum. Nevnast kann, at eitt partafelag verður frítt fyri beinleiðis politiskari uppíblanding, og verður tá betur fært fyri at laga virksemi sítt til skiftandi marknaðarviðurskifti enn ein almennur stovnur. Eisini slepst undan trupulleikum av, at almennur stovnur við studningi úr landskassanum kappast við privatar fyritøkur.

Sambært hesum lógaruppskoti fær landsstýrið heimild til at nýta ognir og rakstrargøgn stovnsins sum fult ella partvíst gjald fyri partabrøvini. Men áðrenn hetta verður gjørt, verður óheft meting gjørd av ognunum.

M/F Smyril, sum í høvuðsheitum røkir uttanlandssigling, verður at leggja í annað partafelag, ið eisini skal javnviga fíggjarliga. Fyri at bøta um raksturin av Smyrli, verður skipið skrásett í FAS.

Ætlanin er, at Strandferðslan móti hóskandi samsýning og sambært eini avtalu, sum landsstýrið góðkennir, røkir fyrisitingina av partafeløgunum, sum sostatt í praksis verða at meta sum dótturfeløg stovnsins.

Bæði innan nýggja reiðarafelagið hjá Smyrli og innan farmaflutningsfelagið verða munadyggar skynsemisbroytingar og helst eisini øktar inntøkur neyðugar,

skal tað eydnast at fáa lønandi rakstur í fyritøkumar, tí sum er, man hetta fyritaksemið kosta landskassanum einar átjan mió. kr. árliga.

Strandferðslan er longu farin undir at fyrireika eina tillaging innan farmaflutningsvirksemið og raksturin av Smyrli til broyttu fortreytirnar. Hetta krevur tó ivaleyst sína tíð, so væntandi verður umskipanin ikki lokin fyrrenn 1. mars, møguliga seinni.

Tá partafeløgini skulu virka sum dótturfeløg og smidliga sampakka við dagligu arbeiðsgongdina á landsstovninum, metir landsstýrið tað skilabest, at nevndin í feløgunum í mesta mun verður sett saman av fólki frá Strandferðsluni. Landsstýrið fer kortini í viðtøkunum hjá feløgunum at treyta sær, at fult alment innlit fæst í virksemið.

## Álit

### í

*løgtingsmáli nr. 91/1992: Løgtingslóg um Strandferðslu Landsins.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 29. januar 1993 og eftir 1. viðgerð 3. februar 1993 beint í samferðslunevndina.

Endamálið við uppskotinum er at gera greiðan skilnað í núverandi stovni Strandfaraskip Landsins soleiðis, at hesin stovnur verður rikin sum nýggjur stovnur sundurskildur í trimum sjálvstøðugum eindum sambært uppgávum stovnsins, nevniliga strandfaraskipini, farmaflutning við lastbilum, trailarum v.m. og síðan m/f "Smyril", sum í høvuðsheitum røkir uttanlandssigling.

Ein høvuðsfylgja av hesi broyting er, at hvør av hesum eindum skal hava sín egna fíggjarliga bygnað og verða rikin eftir vanligum handilsligum treytum og harvið kunna bera seg fíggjarliga uttan almennan stuðul. Tó verður neyðugt við almennum stuðuli, tá talan er um at røkka flutningin til útoyggjarnar.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Eyðun Viderø, Heini Johansen, Jørgen Niclasen og Jógvan A. Johannessen) er samdur um, at stovnurin Strandfaraskip Landsins eigur at verða sundurliðaður, so greiniligari sæst, hvussu raksturin ber seg.

Nevndin hevur havt samrøðu við landsstýrismannin í samferðslumálum um ætlanina, og eisini hevur nevndin havt fund við stjóran á Strandferðsluni um nýggja bygnaðin, og tá serliga fyri at fáa upplýst um ætlaða raksturin hjá m/f "Smyril" í uttanlandssigling. Her varð upplýst, at soleiðis sum bókingin í roknskapinum er skipað frammanundan, so er nærum ógjørligt at gera eina fíggjarætlan fyri Smyril út frá rakstrinum higartil, men er nýggja ætlanin partvís bygd á

royndirnar higartil og síðani á framtíðarvónirnar, ið ein kann rokna seg fram til. Upplýst varð, at talan verður ikki um at halda fram í uttanlandssigling, um rakstrarin ikki fæst at bera seg uttan studning.

Nevndin hevur eisini havt fund við føroysk skipafeløg, ið sigla millum Føroyar og útheimin fyri at frætta um avleiðingar av møguligari kapping um somu rutur. Her kom fram, at vandi altíð er fyri kapping, um siglt verður heilt ella partvís á somu rutum. Tó var framhildið, at eitt skipað samarbeiði eisini kann verða til gagns fyri allar partar, men hetta er treytað av, at eisini somu treytir eru galdandi fyri kostnað fyri flutning við øðrum almennum flutningstólum í Føroyum til avskipingarhavn.

Viðvíkjandi § 2 um loyvi til Strandferðsluna at læna er at siga, at samhæri løgtingslóg nr. 103 frá 17. desember 1991 er Strandfaraskipum Landsins heimilað at læna upp til 10 mió. kr. til fígging av rakstrinum.

Mælt verður til, at henda lánsheimild kemur í lóg um Strandferðslu Landsins, og at lóg nr. 103 frá 17. desember 1991 verður sett úr gildi.

Í § 1, 1. stk. verður Strandferðsla Landsins stytt til SL og mælt verður til, at henda stytting verður nýtt í §§ 2 og 3.

Vísandi til omanfyristandandi viðmerkingar setir meirlutin fram soljóðandi:

**Broytingaruppskot**

**til**

**uppskot landsstýrisins**

1) § 2 verður orðað soleiðis:
"SL verður heimilað at læna upp til 10 mió. kr. til fígging av rakstrinum."
2) Í § 3, 1. stk. verður í staðin fyri "Strandferðslan" sett: "SL".
3) Í § 3, 2. stk. verður í staðin fyri "Strandferðsluna" sett: "SL".
4) Í § 7 verður skoytt uppí sum 2. punktum:
"Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 103 frá 17. desember 1991 um lán til Strandfaraskip Landsins."

1) § 2 affattes således:
"SL bemyndiges til at optage lån op til 10 mio. kr. til finansiering af driften."
2) I § 3, stk. 1 indsættes i stedet for "Strandferðslan": "SL".
3) I § 3, stk. 2 indsættes i stedet for "Strandferðslan": "SL".
4) I § 7 tilføjes som 2. punktum:

"Samtidig ophæves lagtingslov nr. 103 af 17. desember 1991 om lån til Strandfaraskip Landsins."

Meirilutin (Eyðun Viderø, Heini Johansen, Jógvan A. Johannesen og Jørgen Niclasen) tekur annars undir við uppskoti landsstýrisins við frammanfyri nevndu broytingum og mælir tinginum til at samtykkja lógina soleiðis broytta.

Haraftrat førir meirilutin fram, at flutningurin við almennum flutningstólum átti at verið betur samskipaður soleiðis, at bilar hjá t.d. SL, Bygdaleiðum og postflutningur ikki koyra somu leið á nærum somu tíðum, og má hetta haldast at hava óneyðugan kostnað við sær.

Vísandi til omanfyri standandi setir meirilutin fram soljóðandi:

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið heitir á landsstýrið um at skipa so fyri, at koyringin hjá almennum stovnum so sum SL, postverkinum og eisini alment stuðlaðu Bygdaleiðum verður samskipað mest møguligt fyri at minka um óneyðuga flutningskostnaðin.

Til triðju viðgerð av fíggjarlógini fyri 1993 varð samtykt ein viðmerking til § 13265, sum er orðað soleiðis: "Ferðasambandið sjóvegis "Skálafjørður - Tórshavn" heldur fram, til landsstýrið hevur funnið aðra loysn á málinum."

Eftir at bussambandið er fyriskipað millum Skálafjørðin og Tórshavn, hevur landsstýrið lagt "Dúgvuna".

Løgfrøðingar í Tinganesi og á løgtingsskrivstovuni eru ósamdir um, hvørt viðmerkingin merkir, at siglingin hjá "Dúgvuni" skal halda fram - eisini eftir at ferðasambandið við bussi er skipað - ella ikki.

Fyri at løgtingið kann taka støðu í spurninginum, setir meirilutin (Eyðun Viderø, Heini Johansen, Jógvan A. Johannessen og Jørgen Niclasen) fram broytingaruppskot til løgtingsfíggjarlógina 1993.

Skotið verður upp, at løgtingið játtar kr. 2,5 mió. aftrat til Strandferðsluna at nýta til Skálafjarðarsiglingina.

Sostatt verður sett fram soljóðandi:

**Broytingaruppskot**

**til**

**fíggjarløgtingslógina**

Í løgtingslóg nr. 196 frá 30. desember 1992: Fíggjarløgtingslóg fyri árið 1. jan. - 31. des. 1993 verður gjørd hendan broyting:

1) Undir § 13 verður konto nr. 13265: Strandfaraskip Landsins broytt til kr. 25.500.
2) Greinin sett til kr. 194.550.

Landsstýrið hevur í skrivi heitt á formansskapin at kunna løgtingið um ósemjuna, so løgtingsmenn fingu høvi at leggja málið fram til løgtingsins støðutakan, uttan tó at nakað uppskot varð sett fram.

Ein minniluti (Terje Davidsen) tekur ikki undir við uppskotinum og setir eingi uppskot fram.

Ein minniluti (Heini O. Heinesen) førir fram:

Lógin um Strandferðslu Landsins hevur til endamáls, at taka alt vald frá løgtinginum og flyta tað til landsstýrið og stovnsleiðsluna.

Undir 1. viðgerð kom fram, at reglugerðin fyri stovnin ikki verður hildin, og eisini kom fram, at siglt verður millum lond við Smyrli við stórum halli, sum eingin játtan er fyri á fíggjarlógini.

Ólýdni landsstýrisins mótvegis løgtinginum í málunum um "Dúgvuna" merkir haraftrat, at eingi útlit eru fyri, at skipað viðurskifti fáast fyri henda stovn við hesi ófullfíggjaðu lóg.

Verður lógin samanborðin við lógina fyri postverkið frá 1974, sum eisini er ein almenn flutningsfyritøka, so sæst, at :

1) ongar ásetingar eru, um stovnurin skal røkja innanoyggja, millumlanda- ella innanoyggja og millumlanda sigling,
2) ongar ásetingar eru um starvsfólkaviðurskifti,
3) ongar ásetingar eru um einkarrættindi,
4) ongar ásetingar eru um ábyrgdar- og tryggingarviðurskifti av ferðafólki og farmi,
5) ongar ásetingar eru um góðkenning av ferðaætlan,
6) ongar ásetingar eru um avgreiðslur,
7) ongar ásetingar eru um flutningsgjøld,
8) ongar ásetingar eru um leinting og útflýgging,
9) ongar ásetingar eru um endurgjald,
10) ongar ásetingar eru um sektarreglur, og
11) ongar ásetingar eru um heimildarreglur.

Allar hesar omanfyri nevndu heimildir verða lagdar til stjóran fyri Strandferðsluna, og er tað, so ótrúligt tað enn ljóðar, júst tað, sum endamálið er við lógaruppskotinum. Løgtingið frásigur sær alla ávirkan á raksturin av hesum stovni, sum allar grundir tala fyri, er at styrkja.

Mælt verður tí til, at lógaruppskotið verður tilevnað av nýggjum á sama lógargrundarlagi, sum galdandi er fyri aðrar almennar stovnar, t.d. postverkið.

Vísandi til ólýdnið og provokatiónir landsstýrismansins mótvegis løgtinginum við avtøku av siglingini hjá "Dúgvuni", tapsgevandi millumlandasiglingini hjá "Smyrli" uttan játtan á fíggjarlógini, ólógligu uppsagnirnar á Strandferðsluni og vísandi til §§ 4, 5 og 6 í lóg um ábyrgd landsstýrismanna verður mælt til soljóðandi:

**I Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið samtykkir at loysa landsstýrismannin Svend Aage Ellefsen úr starvi sínum sum landsstýrismaður.

Ávirkan løgtingsins á farleiðir, ferðaætlanir, títtleika, skip, keyp og sølu v.m., sum verður avtikin við lógaruppskotinum, eigur tvørturímóti at styrkjast.

Vísandi til hesar og frammanfyri givnu grundgevingar setir minnilutin (Heini O. Heinesen) fram soljóðandi:

**II Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at gera nýtt lógaruppskot í tráð við galdandi lóg fyri líknandi almennar stovnar, t.d. postverkið, og soleiðis, at ávirkan løgtingsins á samferðslumynstrið verður styrkt heldur enn avtikið.

Hin triði minnilutin (Lasse Klein) førir fram, at neyðugt er at fremja broytingar á økinum hjá Bygdaleiðum og Strandfaraskipum Landsins og at samskipa virksemi teirra í størri mun enn higartil.

Nú nýggj amboð eru tikin í nýtslu, verða stovnarnir betur førir fyri at fáa greiðari sundurskiljing av inntøkunum millum bussar og skip. Eisini fæst greiðari sundurskiljing av rakstrarútreiðslunum, nú ætlanin er at leggja partar av virkseminum hjá strandfaraskipunum í eitt partafelag, sum í dagliga rakstri sínum skal svara hvørjum sítt, og tí slepst eisini undan, at almennir stovnar við studningi úr landskassanum kappast við privatar fyritøkur.

Víst verður á, at uppskotinum tørvar ásetingar á mongum økjum, og at tað tí er sera ófullfíggjað og óheppið at seta eitt uppskot sum hetta í verk við ongum ásetingum, og sum ger, at torført er at meta um, hvussu stovnurin í framtíðini verður rikin, og at løgtingið í ov stóran mun sleppur endanum, áðrenn týðandi partar av rakstrinum eru komnir í fastan lógarkarm.

Minnilutin (Lasse Klein) tekur annars støðu í tingsalinum.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 91/1992: Løgtingslóg um Strandferðslu Landsins.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 29. januar 1993 og eftir 1. viðgerð 3. februar 1993 beint í samferðslunevndina. Undir 2. viðgerð varð málið aftur beint í samferðslunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið av nýggjum og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Lasse Klein, Heini Johansen, Jógvan A. Johannessen og Heini O. Heinesen) er samdur um at beina málið aftur í landsstýrið, og vísandi til omanfyri standandi setir meirilutin fram soljóðandi:

## Uppskot

## til

## samtyktar

Løgtingið samtykkir at beina landsstýrinum málið aftur.

Ein minniluti (Svend Aage Ellefsen og John Petersen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins við teimum broytingum, sum meirilutin (Eyðun Viderø, Jørgen Niclasen, Jógvan Adolf Johannessen og Heini Johansen) setti fram uppskot um í fyrra álitinum.

Minnilutin vísir á, at Strandferðslan í samráð við landsstýrið, áðrenn landsstýrisskiftið, arbeiddi við at lata byggja nýtt skip til Sandoyarsiglingina. Í hesum sambandinum er gamla verkætlanin frá áttatiárunum gjøgnumgingin og nútíðargjørd av ráðgevandi verkfrøðingi, og arbeitt varð eisini við at finna fígging til byggingina. Í so máta kundi ein møguleiki verið at latið danska Skipskredittgrunnin við langfreistaðum lágrentuláni fíggjað upp til áttati prosent av byggiprísinum, um skipið ikki varð beinleiðis ogn hjá landskassanum.

Ein fyriliggjandi fíggingarmøguleiki hevði tí verið, at partafelag í Strandferðsluhøpi samsvarandi fyriliggjandi lógaruppskoti lat skipið byggja og átti skipið, sum Strandferðslan langtíðarleigaði fyri upphædd, svarandi til rentur og avdráttir.

Í hvussu er, mælir minnilutin landsstýrinum, at halda fast við ætlanirnar at byggja nýtt skip til Sandoyarsiglingina, nú Tróndur fellur fyri nýggju hørðu trygdarkrøvunum til ferðafólkaskip.

Í hesum arbeiðsloysistíðum hevði byggisáttmáli til nýggja Sandoyarferju komið væl við hjá føroyskum skipasmíði, og eisini hevði byggiprísurin verið hóskandi lágur, nú so lítið annars er til hendurnar at taka.

Fyri at halda nýggja landsstýrinum til byggiætlanirnar, setir minnilutin tí fram soljóðandi:

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Landsstýrinum verður álagt at finna fígging til og lata byggja nýggja ferju til Sandoyarsiglingina.

Ein minniluti (Agnar Nielsen) mælir eisini frá at senda landsstýrinum málið aftur.

# 92. Broyting í løgtingslóg um fólka- og farmaflutning

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólka- og farmaflutning.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 51 frá 1. juni 1977 um fólka- og farmaflutning verður gjørd hendа broyting:

§ 2 verður strikað.

**§ 2.**

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

*lagtingslov om ændring i lagtingslov om passager- og godsbefordring.*

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 51 af 1. juni 1977 om passager- og godsbefordring foretages følgende ændring:

§ 2 ophæves.

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

**Viðmerkingar:**

§ 2 í lógini um fólka- og farmaflutning ásetir, at veljast skal ein samferðslunevnd, hvørs uppgáva skal vera at samskipa allan fólka- og farmaflutning í Føroyum.

Vísandi til bygnaðarbroytingarnar innan samferðsluøkið seinastu árini og uppskot landsstýrisins til løgtingslóg um Strandferðslu Landsins, skjýtur landsstýrið upp, at ásetingarnar í § 2, sum eru um Samferðslunevndina og virksemi hennara, verða strikaðar.

## Álit

í

*løgtingsmáli nr. 92/1992: Broyting í løgtingslóg um fólka- og farmaflutning.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 29. januar 1993 og eftir 1. viðgerð 3. februar 1993 beint í samferðslunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

# 93. Løgtingslóg um lántøku til landskassan

## Uppskot

til

*løgtingslóg um lántøku til landskassan.*

**§ 1.**

Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at læna 350 mió. kr. at skjóta inn í Fíggjargrunnin frá 1992 at nýta til nýggjan eginpening í Sjóvinnubankanum.

**§ 2.**

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

*lagtingslov om optagelse af lån til landskassen.*

**§ 1.**

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage et lån på 350 mio. kr. at indskyde i Finansieringsfonden af 1992 til brug for ny egenkapital i Sjóvinnubankin.

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

**Viðmerkingar:**

Føroya Landsstýri hevur tann 1. februar 1993 gjørt ískoyti til tann sáttmála, sum gjørdur varð við donsku ríkisstjórmina tann 6. oktober 1992. Hetta ískoyti er gjørt í samband við, at neyðugt var at veita Sjóvinnubankanum nýggjan kapital, so Sjóvinnubankin kundi uppfylla solvenstreytirnar í bankalógini.

Sambært ískoytinum til avtaluna frá 6. oktober 1992 fær landsstýrið lán, stórt 350 mió. kr., frá danska Tjóðbankanum. Landsstýrið setir síðan hesa upphædd í Fíggingargrunnin frá 1992. Fíggingargrunnurin frá 1992 setir síðan nýggjan partapening í P/F Sjóvinnubankan, so bankin aftur uppfyllir eginpeningstreytirnar í bankalógini.

Landsstýrið metir, at um Sjóvinnubankin varð noyddur at steðga sínum virksemi, so hevði hetta ført til eitt stórt misálit á føroyska peningakervið bæði frá útlendingum og føroyingum sjálvum. Hetta kundi í øðrum lagi ført til ruðuleika og at peningakervið og samfelagið sum heild steðgaðu upp. Ætlan landsstýrisins er sostatt ikki bert at bjarga einum banka, sum var um at fara á húsagang, men at endurreisa álitið á føroyska peningakervið og samfelagið sum heild.

Tá lánið fellur til gjaldingar tann 5. mai 1993, verður tað lagt um til eitt lán beinleiðis frá danska ríkiskiskassanum.

Við framlagda lógaruppskoti søkir landsstýrið løgtingið um heimild at taka 350 mió. kr. í láni.

Í tí undirskjali, sum er grundarlag undir ískoytissáttmálanum frá 1. februar 1993, boðar landsstýrið frá, at ætlanin er at taka lánsbrævalán frá Føroya Sparikassa og Tryggingarsambandinum. Sambært undirskjalinum verður ríkisveðhald veitt fyri hesum lánsbrævaláni. Hetta lán verður tikið til endurfígging av landskassalánum og fyri at styrkja gjaldføri landskassans og harvið samfelagsgjaldførið.

Sambært sáttmálanum millum donsku ríkisstjórmina og landsstýrið frá 6. oktober 1992, skal fíggjarlógin fyri 1993 javnviga og sostatt skal nettoskuld landskassans ikki økjast í 1993. Sambært lántøkulógini frá 20. desember 1991 hevur landsstýrið altíð heimild til endurfígging og umlegging av verandi lánum.

Sostatt er ikki neyðugt hjá landsstýrinum at søkja um heimild frá løgtinginum til at taka omanfyrinevnda lánsbrævalán.

Hjálagdur er løgtinginum til kunningar ískoytissáttmálin millum Ríkisstjórn Danmarkar og Føroya Landsstýri og harumframt tær ásanningar, fráboðanir og felagsyvirlýsingar, sum vóru grundarlag undir gjørda sáttmálanum.

*(Skjal)*

**Erklæring fra Færøernes landsstyre**

Landsstyret konstaterer, at

- der på Færøerne er gennemført stop for nye fiskerilicenser og for støtte til anskaffelse af fiskefartøjer
- der er skabt sikkerhed for, at der er egenkapital tilstede ved erhvervelse af fiskefartøjer
- der er taget initiativ til en gradvis afvikling af asymmetrien i rentebeskatningen.
- der er taget initiativ til revision af indtægtssikringen for fiskere, så den ydes ud fra den samlede indtjening.

Landsstyret har overfor den danske regering tilkendegivet at følgende yderligere initiativer er taget eller vil blive taget.

- I det nye lovforslag, som er fremlagt til endelig vedtagelse, har man fastlagt en reduktion af antallet af fangstlicenser til partrawlere, stållineskibe og skovltrawlere. Landsstyret fortsætter sit arbejde med fiskerilovgivningen, som sigter mod at tilpasse fangstkapaciteten.
- Landsstyret nedsætter et strukturudvalg, der inden 1. juli 1993 skal fremkomme med forslag til en nettoreduktion af kapaciteten med henblik på at gøre fiskerierhvervet til et selvbærende erhverv hvilende på bl.a. det biologisk optimale fangstniveau i farvandet omkring Færøerne og på markedsøkonomiske vilkår. Hjemmestyret er instillet på at revidere sin lovgivning i overensstemmelse med udvalgets rådgivning.
- Tilpasning af arbejdsløshedsforsikringsordningen, så der bliver balance mellem udgifter og indtægter.
- Budgettet tilpasses løbende med udgangspunkt i anvisningerne fra IMF.
- Skatteloftet justeres, så eventuelt stigende niveau i de kommunale skatter ikke belaster landskassen.
- Der gennemføres i 1993 et stop for landsstyrets nye anlægsinvesteringer.
- Der udstedes et obligationslån med henblik på refinansiering af landsstyrelån på 300 mill. i 1993, idet Landsbanken bemyndiges til med de færøske sparekasser og forsikringsselskabet at aftale, at disse institutioner aftager de udstedte obligationer. Staten giver garanti for det lånebeløb, der omfattes af aftalen.
- Inden udgangen af 1993 fremlægges forslag til modernisering af den færøske lovgivning om forsikringsvirksomhed.

– Lovgivningen om et internationalt skibsregister skal vedrøre skibe med en reel tilknytning til Færøerne. Tilknytningen udformes på samme måde som i det danske DIS-regler.

**Fælleserklæring fra den Danske Regering og Det Færøske landsstyre**

På foranledning af Finansieringsfonden af 1992 og i samarbejde med færøske pengeinstitutter og andre finansielle institutioner med interesser på Færøerne etableres der en strukturfond med det formål at bidrage til en reorganisering af levedygtige virksomheder og i fornødent omfang at medvirke ved afviklingen af nødlidende erhvervsengagementer.

Vedrørende erhvervslovgivningen er parterne enige om, at følgende love ved kgl. anordning sættes i kraft på Færøerne:

1. aktieselskabsloven (AL), jf. lovens § 163.
2. anpartsselskabsloven (ApAL), jf. lovense § 133.
3. årsregnskabsloven (ÅRL), jf. lovens § 68.
4. erhvervsfondsloven (LEF), jf. lovens § 65.
5. bank- og sparekasseloven på Færøerne, jf. lovens § 55,
6. lov om visse kreditinstitutter, jf. lovens § 7.

Færøske ønsker om overgangsordninger og modifikationer skal vær industriministeriet i hænde så betids, at anordningerne kan udstedes senest den 18. januar 1993.

Særlige beføjelser, der efter de nævnte love tilkommer Erhvervs- og Selskabsstyrelsen (f.eks. ApSÆ § 85, ÅRL § 64, LEF § 59), kan efter aftale mellem styrelsen og den færøske registreringsmyndighed i nærmere bestemt omfang overlades den færøske registreringsmyndighed.

Der indgås senest den 18. april 1993 en aftale mellem Erhvervs- og Selskabsstyrelsen og den færøske registreringsmyndighed om samarbejde og om førelse af det færøske register, for så vidt angår de under 1. til 4. nævnte love.

Landsstyret fremlægger senest den 18. april 1993 forslag til justering af den færøske revisor- og bogføringslovgivning, der i det væsentlige og i resultatet svarer til den danske lov om registrerede og statsautoriserede revisorer og den danske bogføringsbekendtgørelse fra 1990. Landsstyret er blandt andet indstillet på at oprette et af Færøerne betalt disciplinærnævn for revisorer. Det revisornævn, der er oprettet ved den danske lov om statsautoriserede revisorer, får samme beføjelser i forhold til det færøske disciplinærnævn som i forhold til de disciplinærnævn, der er oprettet ved de danske revisorlove.

Det tilstræbes at sætte fremtidige ændringer i de nævnte erhvervslove i kraft på samme tid i Danmark og på Færøerne.

Der optages forhandlinger mellem den danske regering og det færøske landsstyre om omlægning af statens tilskud og refusioner til et generelt bloktilskud til hjemmestyret.

**Statsministeriet** *Den 1. februar 1993*

Tillægsaftale til aftale af 6. oktober 1992 mellem den danske regering og det færøske landsstyre med senere ændringer.

1. Nationalbanken refinansierer gældsbeviser for 350 mio. kr. udstedt til de færøske pengeinstitutter. Gældsbeviserne har en løbetid til 5. maj 1993.

2. Der ydes statsgaranti for landsstyregældsbeviserne og eventuel likviditetsførsel fra Nationalbanken til Sjóvinnubankin.

3. Landsstyret indskyder beløbet i Finansieringsfonden af 1992.

4. B-aktiekapitalen i Sjóvinnubankin nedskrives til 35, 3 mil. kr.

5. Fonden indskyder ny kapital i Sjóvinnubankin. Fonden afgør fremtidig stemmefordeling og eventuelt fordeling mellem aktiekapital og ansvarlig kapital.

6. Ved forfald af gældsbeviserne fra Landsstyret indtræder staten som långiver.

7. Aftalen har som forudsætning en række konstateringer og tilkendegivelser fra det færøske landsstyre samt en fælleserklæring fra den danske regering og det færøske landsstyre jfr. bilag.

8. Lån i Nationalbanken forrentes til diskonto.

9. Statslånet ydes på samme betingelser som i henhold til den tidligere aftale.

10. Nærværende aftale er betinget af, at der er politisk tilslutning i Danmark til de nødvendige aktstykker og lovændringer.

11. Nærværende aftale er betinget af, at der er politisk tilslutning på Færøerne til at gennemføre den nødvendige lovgivning.

# Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 93/1992: Løgtingslóg um lántøku til landskassan.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 4. februar 1993 og eftir 1. viðgerð 6. februar 1993 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og havt fund við Maritu Petersen, løgmann, og Kára Petersen, fíggjarstjóra á landsskrivstovuni. Løgmaður handaði nevndini frágreiðing frá tingingunum tann 1. februar 1993 millum donsku stjórnina og landsstýrið. Hetta snúði seg um tað arbeiðið, "strukturudvalget" skal gera.

Fíggjarnevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og tríggjar minnilutar.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Frank Davidsen, Anfinn Kallsberg og Birgir Danielsen) tekur undir við málinum og mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Finnbogi Arge) hevur hesar viðmerkingar:

Konservativa/Vinstra stjórnin setti landsstýrinum sera rímiligar treytir fyri at hjálpa Sjóvinnubankanum og landsstýrinum tann 6. oktober 1992 við tilsamans 500 mió kr.. Treytirnar vóru hesar:

1) Landsstýrið skuldi smíða eina nýggja og realistiska fíggjarlóg við útreiðslum, sum svaraðu til inntøkurnar.
2) Landsstýrið skuldi laga seg eftir eini javnvágarætlan, sum IMF búskaparfrøðingar skuldu gera.
3) Landsstýrið skuldi dagføra vinnulívslóggávuna (banka-, partafelags- og grannskoðaralóggávuna).

Sambandsflokkurin, sum til fánýtis hevði roynt at fingið eina realistiska fíggjarlóg, helt hesar høvuðstreytir vera skilagóðar. Flokkurin tók undir við lántøkuni av tí, at krøvini tvingaðu samgonguna at reka ein betri búskaparpolitikk.

Men ov seint var. Tað gekk bert umleið ein ársfjórðingur, til Føroya Landsstýri enn einaferð noyddist niður á danating. Henda vitjan kom óvæntað á danir. Og tað var einki at siga til, tí bæði løgmaður og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum høvðu boðað um geilar, at Sjóvinnubankin nú var betri fyri enn nakrantíð.

Tann nýggja javnaðarstjórnin hevur eins og tann undanfarna sett nøkur skilagóð og rímulig krøv, ið, sum frálíður, fara at gagna føroyska búskapinum og tí fólki, ið her býr. Hesi krøv eru í stuttum:

1) Veiðuorkan skal lagast til fiskastovnarnar.

2) Fíggjarlógin skal broytast so hvørt, sum IMF búskaparfrøðingar koma við tilmæli.

3) Ætlaðu nýíløgurnar í 1993 verða steðgaðar.

4) Uppskot um nýggja tryggingarlóg skal leggjast fyri tingið í hesum ári.

5) Fíggjargrunnurin frá 1992 skal saman við peningastovnunum seta ein strukturgrunn á stovn, sum skal medvirka til at endurreisa virkir, sum hava møguleika at bera seg í framtíðini.

6) Donsk vinnulóggáva skal setast í gildi í Føroyum við møguligum skiftisreglum og tillagingum.

Sambandsminnilutin kann ganga undir hesi krøv, men hevur ta viðmerking, at smáu viðurskiftini her á landi hava við sær, at ávísar tillagingar eru neyðugar, tá donsk vinnulóggáva verður sett í gildi.

Men tað eru tvinnar treytir frá donsku javnaðarstjórnini, sum Sambandsflokkurin ikki kann taka undir við, av tí at hesar treytir hava negativar avleiðingar fyri føroyska samfelagið.

Eingin ivi er um, at danir geva føroyingum eina framúr góða viðgerð, men treytirnar, sum ikki áttu at verið við, eru hesar:

1) At skattatrýstið enn einaferð hækkar uttan fyrilit og

2) At samráðingar skulu verða millum donsku stjórnina og landsstýrið um at leggja refusiónirnar, sum eru uttanfyri hlokkstuðulin, inn í blokkin.

Í avtaluni stendur, at "skatteloftet justeres, så eventuelt stigende niveau i de kommunale skatter ikke belaster landskassen".

Henda orðingin er sera óheppin, tí hon fer at hava við sær, at skattatrýstið í teimum kommunum, ið ringast eru fyri, fer upp ígjøgnum.

Avleiðingarnar verða bert negativar. Royndirnar vísa, at hægri skattatrýst ikki av sær sjálvum førir til hægri inntøkur. Tað hava seinastu fíggjarlógir løgtingsins prógvað.

Høgt skattatrýst økir um svart arbeiði, hevur minkandi virkishug við sær og fær fleiri at koma til ta niðurstøðu, at tað kann gera tað sama, um tey hava arbeiði ella ikki. Í krónum og oyrum verður minni munurin, um fólk hava arbeiði ella ganga arbeiðsleys. Skatturin fer við tí meirinntøku, sum tann, ið arbeiðir, fær.

Tey, sum ikki eru bundin at húsum, fara helst at umhugsa at flyta til aðrar kommunur, ið hava eitt lægri skattaprosent. Og tað verða tey, sum heldur velja at fara

av landinum enn at flyta bústað innanlands. Aftan á meirvirðisgjald, eykaskatt, rentuskatt, skatt á pensjónistar umframt hópin av øðrum skattatiltøkum skal lítið til, áðrenn bikarið flýtur yvir.

Samanumtikið ivast minnilutin ikki í, at hesin parturin í avtaluni millum donsku stjórnina og Føroya Landsstýri fer at gera støðuna hjá kommununum enn verri.

Hitt brotið í avtaluni, sum Sambandsflokkurin ikki kann góðtaka, er soljóðandi:

"Der optages forhandlinger mellem den danske regering og det færøske landsstyre om omlægning af statens tilskud og refusioner til et generelt bloktilskud."

Tað er eingin loyna, at Sambandsflokkurin altíð hevur verið ímóti blokkstuðulsskipanini. Henda skipan varð ætlað donskum kommunum. Tað er sera óheppið at tvinga hesa skipan inn í heimastýrið, tí heimastýrið hevur so nógvar aðrar uppgávur, sum danskar kommunur ikki hava.

Sambandsins ótti fyrr, at bjartskygdir føroyskir politikkarar fóru at brúka blokkstuðulin sum best bar til, var væl grundaður. Peningur er t.d. tikin frá skúlaverkinum og er brúktur til onnur endamál. Býtið av almannaútreiðslum millum land og kommunur er broytt á fleiri økjum til skaða fyri kommunurnar. Óskilið á Almannastovuni, sum gjørdist høvuðstíðindi í donsku pressuni, er eisini eitt dømi um vantandi stýring. Meðan almennar tænastuveitingar hava verið við skerdan lut, er peningur oyðslaður til óproduktivar fløgur í tunnlar, havnir, vegir og annað.

Í dag eru bert sosialar veitingar og yrkiskar pensjóns- og tryggingarveitingar uttanfyri blokkstuðulsskipanina. Sambandsflokkurin heldur, at pensjónirnar framvegis skulu haldast uttanfyri. Tí skuldbindingin av føroyska samfelagnum hevur tann vanda við sær, at sosialar veitingar kunnu verða skornar niður í einki, til frama fyri vaksandi rentubering út úr landinum. At geva núsitandi landsstýri møguleika frítt at ráða yvir tilskotum og refusiónum, er tað sama sum at siga farvæl til eitt sosialt trygdamet, sum eitt nú fólka- og avlamispensjónistar enn hava í Føroyum.

Vit sleppa ikki undan at ásanna, at blokkstuðulsskipanin hevði eina risastóra almenna umsiting við sær. Henda kostnaðarmikla umsiting holaði burtur úr veitingarvirðinum. Tað er m.a. hetta, sum Sambandsflokkurin ikki vil skal henda aftur.

Tað er komið fram, at danska stjórnin upprunaliga hevði ætlað føroyingum harðari treytir, enn tær, sum endaliga spurdist burturúr. Talan hevur verið um eina samráðingarprocess, har partarnir hava lagað seg eftir sjónarmiðunum hjá hvørjum øðrum. Men andstøðan í Føroyum er ikki tikin upp á ráð. Hon hevur ongan møguleika havt at ávirka avtaluna, hóast hon umboðar stóran part av Føroya fólki.

Sambandsflokkurin býður seg við hesum til at taka undir við avtaluni. Men treytin verður tann, at landsstýrið boðar donsku stjórnini frá, at Føroya Løgting ynskir at broyta avtaluna á tveimum økjum:

1) Viðmerkingarnar um skattaloftið verða strikaðar.

2) Orðingin um samráðingar um blokkstuðulin fellur burtur.

Tann fyrra kreppuavtalan, sum gjørd var tann 6. oktober 1992 við KV stjórnina, var politisk neutral. Stjórnin setti treytir, sum bæði samgonga og andstøða kundu taka undir við.

Tann seinna avtalan frá 1. februar er ikki politisk neutral. Hon fremur partapolitisk endamál hjá sitandi samgongu. Sum dømi kann nevnast, at avtalan økir skattatrýstið, sum er eitt av aðalmálum javnaðarmanna. Eitt annað dømi er orðingin um at leggja tilskot og endurveitingar inn í blokkin. Hetta hevur verið hjartamál hjá Fólkaflokkinum.

Minnilutin heldur, at avtalan eigur at verða lúkað fyri partapolitiskum áhugamálum hjá samgonguni, og setir fram soljóðandi:

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður Landsstýrinum at broyta treytirnar fyri lántøku soleiðis, at orðingin um skattaloftið verður strikað, og viðmerkingarnar um umlegging av veitingum og refusiónum til blokkstuðul fella burtur.

Minnilutin (Heini O. Heinesen) ger hesar viðmerkingar:

Bert fýra mánaðir eru gingnir, síðani landsstýrið setti 500 mió. kr. í Píggingargrunnin frá 1992, sum síðani setti 430 mió. kr. sum parta- og eginpening í Sjóvinnubankan. Hóast landsstýrið sostatt átti henda grunn, eigur ríkisstjórnin 3 av 5 nevndarlimum og formannin í grunninum.

Tað vóru danskir fíggjarfrøðingar á hægsta stigi, sum søgdu, at 500 mió. kr. vóru nóg mikið til, at bankin trygt kundi halda fram. Nú siga hesir somu donsku fíggjarfrøðingar, at 350 mió. kr. aftrat eru neyðugar.

Hóast danir við hesum hava prógvað sín ódugnaskap, misbrúkar danska stjórnin ta torføru búskaparstøðuna í Føroyum til at taka ræðið yvir allari umsiting, vinnulívi og lóggávuvaldi í Føroyum uttan kortini formelt at seta heimastýrislógina úr gildi. Reelt hevur hon tó einki virði longur, og landsstýrið er ikki annað enn eitt amboð, sum skal fremja tey boð, tað fær av Christiansborg.

Eins og 6. oktober gekk landsstýrið 1. februar undir óvanliga harðar treytir fyri at fáa lán til bankan. Landsstýrið varð boðsent at koma í skundi til Keypmanna-

havnar, og har skuldi skrivast undir beinanvegin. Hetta er sera ódámligur og harðrendur atburður, stjórnin nýtir, tí einki var til hindurs fyri, at Sjóvinnubankin varð stongdur í nakrar dagar, meðan samráðingar vóru.

Danir hava sett seg oman á báðar teir stóru bankarnar, danir krevja týðandi umskipanir á økjum, sum eru føroysk sermál, og danir skulu nú avgera, hvussu fiskiflotin skal síggja út, hvørjar fyritøkur skulu halda fram, og hvørjar skulu halda uppat. Heimastýristíðin er farin, og amtstíðin er komin í gildi aftur.

Soleiðis, sum støðan er í samfelagnum, ivast minnilutin í, at 350 mió. kr. hjálpa nakað sum helst. Orsakað av heimastýrislóginí hava føroyingar - politikarar, bankamenn, vinnulívsmenn og onnur - framt so stór mistøk, at samfelagið í veruleikanum er eitt trotabúgv.

Minnilutin heldur tí, at umboð fyri løgtingið eiga at taka upp samráðingar við ríkisstýrið um eina nýskipan av viðurskiftunum Føroya og Danmarkar ímillum í samsvari við fólksins vilja soleiðis, sum hann kom fram á fólkaatkvøðuni 14. september 1946. Hevði fólksins vilji verið framdur tá. hevði støðan ikki verið so ring í dag.

Ein slík nýskipan má hava til endamáls, at føroyska samfelagið frameftir verður útbygt samsvarandi føroyskum tørvi og orku, at ein loysn fæst á uttanlandsskuldini, so komandi ættarlið kunnu verða annað enn bert rentugjaldarar og at føroyska samfelagið fær ein møguleika at fóta sær aftur.

Tjóðveldisflokkurin hevur undir viðgerðini av hesum máli mælt til, at ein skjótt arbeiðandi arbeiðsbólkur av óheftum fólkum ger eitt upprit um, hvørjar avleiðingarnar høvdu verið fyri samfelagið, um Sjóvinnubankin hevði farið á húsagang. Meirilutin í fíggjarnevndini tekur ikki undir við hesum tilmæli.

Tað eru týðulig tekin um, at ein ávís samanrenning við EF-áhugamál verða framd í hesi loysn. Danskir politikarar høvdu hetta á máli undir viðgerðini á Fólkatingi, og lógarverkið um banka, sparikassa, grannskoðara, partafeløg, smápartafeløg, ársroknskapir, vinnugrunnar og lóg um kredittstovnar eru samsvarandi EF-direktivum á hesum øki.

Áhugin fyri at fyrireika bygnaðin í fiskivinnuni og minstuløn arspurningurin eru eisini heftir at EF-áhugamálum.

Minnilutin tekur út frá viðmerkingunum frammanfyri ikki undir við uppskoti landsstýrisins og kann als ikki góðtaka tær treytir, sum ríkisstjórnin hevur lagt við.

Føroya løgting hevur fingið skriv frá starvsfólkafelagnum á Elektron, har heitt verður á løgtingið, um at taka støðuna hjá Elektron við í málsviðgerðina. Tað kann tykjast løgið, at peningastovnar, sum hava verið við at uppbygt sína EDV tænastu saman við tí almenna á Elektron, nú skulu niðurbróta eitt samstarv, sum hevur virkað væl seinastu 10 árini. Heraftrat kemur, at hesir somu peningastovnar eiga bróðurpartin í hesi somu fyritøku. Eftir hvat vit hava skilt, hevur hetta sam-

starv verið til fyrimun fyri allar partar. Starvsfólkið á Elektron følir seg hótt av sínum egna arbeiðsgevara, og tá uttan grund. Hetta hendir, hóast starvsfólkini eru farin 10% niður í løn. Hetta var samtykt longu í fjørheyst. Aftrat hesum er yvirtíðin so at siga burtur, so kostnaðarstøðið kann ikki skyldast upp á longur. Í blaðgrein í dag heitir ein av stjórunum á tí størstu privatu EDV-fyritøkuni í Føroyum á løgtingið, um neyðugt við lóg at tryggja, at Sjóvinnubankin ikki sleppur at flyta sína EDV -tænastu av landinum.

Um fíggingarstovnarnir rinda virkjum her á landi fyri at veita teimum EDV-tænastur, er greitt, at ein týðandi partur av hesum peningi fer til lønir. Hetta er týdningarmikið í hesum tíðum. Hetta skuldi eisini lætt um hjá arbeiðsloysistryggingini. So kann verða spurt, hvørjar grundgevingar hava bankarnir fyri at fara av landinum við síni EDV-skipan? Tann fyrra er kostnaðurin fyri tænastuna. Her má so tann samfelagsligi týdningurin eisini havast í huga.

Tann seinna grundgevingin er, at bankin fær atgongd til somu tænastur, sum nakrir útlendskir stovnar hava. Tað er ikki givið, at hesar tænastur eru hóskiligar hvørki nú ella framyvir í Føroyum.

Tjóðveldisflokkurin er ikki í iva um, at vit skulu sjálvir seta rammur fyri, hvussu okkara land skal útbyggjast. Tað er tí eitt krav frá fólkinum, at tann bankin, sum landið nú eigur, ikki skal flyta sína EDV-tænastu av landinum og harvið gera nógv fólk arbeiðsleys.

Heraftrat liggur fast, at um peningastovnarnir flyta sína EDV-tænastu av landinum, er grundarlagið undir "Elektron" farið, og teir almennu stovnarnir verða noyddir at gjalda gildið. Her kunnu nevnast Landsfólkayvirlitið, Líkningarráðið, Tollstovan, Húsalánsgrunnurin, Menningargrunnurin og aðrir. Hesar tænastur koma at hækka við fleiri 10 tals milliónum um árið.

Eisini er vandi fyri, at P/F Elektron fer á heysin, og landskassin verður noyddur at leggja út fyri at bjarga sínum tænastum, aftan á at hava lagt út fyri Sjóvinnubankan tvær ferðir.

Tá danska Ríkisstjórnin setir so hørð krøv, sum her er talan um, kann tað ikki verða nakað forgjørt í tí, at løgtingið setir eitt so náttúrligt krav til, at Sjóvinnubankin ikki flytur hesa EDV-tænastu av landinum, sum sambært egnu kanning kann fáast líka bílig í Føroyum.

Vísandi til omanfyri standandi viðmerkingar setir minnilutin fram soljóðandi uppskot til samtyktar:

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrinum at treyta sær í samband við, at landskassin leggur út 350.000.000,00 kr. fyri at bjarga Sjóvinnubankanum undan húsagangi, at bankin ikki sleppur at flyta sína EDV-tænastu av landinum.

Ein triði minniluti (Asbjørn Joensen) ger hesar viðmerkingar:

Hóast einans fimm mánaðir eru farnir, síðan fyrstu atløguna á danska tjóðbankan um hjálp, er aftur áheitan um hjálp til at endurreisa ein av føroysku bankunum.

Sjálvstýrisflokkurin kann verða samdur við sitandi samgongu, í at tiltakið er neyðugt sum ein roynd at redda tað, ið møguligt er, av okkara vinnu, men er flokkurin sera misnøgdur við tær treytir, ið settar eru í hesum sambandi, ikki minst grundað á úttalu frá donskum parlamentarikarum um, at tað eru vit og ikki danir, ið eiga bróðurpartin av hesum settu krøvum.

Í viðløgdum skjali til lógaruppskotið verður sagt. "Oversigt over *mulige* betingelser til indarbejdelse i pkt. 7 i tillægsaftale....."

Grundað á hesa orðing verður heitt á landsstýrið um møguliga broyting av hesum treytaleysa massanum, so vit framhaldandi kunnu ásanna, at vit ikki heilt eru sett undir danska fyrisiting.

Í samband við hesar afturvendandi fíggjarkreppur í føroyska bankaheiminum mótmælir Sjálvstýrisflokkurin, at hin vanligi føroyingurin gerst offur fyri einum skilaleysum fiskivinnupolitikki, sum hevur týnt okkara fiskastovnar - sjálvt lívsgrundarlagið fyri okkara tilveru, og ein treyt fyri, at vit kunnu fóta okkum aftur.

Sjálvstýrisflokkurin legði m.a. í oktober 1992 fram sína hugsan um neyðug tiltøk, sum eina treyt fyri at bøta um støðuna. Nú verða hesar álagdar okkum av øðrum.

Sambært avtaluni frá oktober 1992 um 500 mió. kr. lán til bjarging av Sjóvinnubankanum skuldu løgting og landsstýri fylgja ráðum frá IMF. Nú eru hesi ráð broytt til treytaleyst at justera fíggjarlóg o.a. eftir boðum frá IMF.

Soleiðis er alt frælsi og sjálvræði í veruleikanum suspenderað grundað á krøv, ið als ikki áttu at havt samband við bjarging av einum banka.

Tó ásannar minnilutin (Asbjørn Joensen), at fullkomin ruðuleiki hevði valdað í samfelagnum, fór annar stóri banki okkara okkara á húsagang, og tekur tí undir við uppskoti landsstýrisins um heimild til lántøku.

**Uppískoytisálit**

**í**

*løgtingsáliti nr. 93/1992: Løgtingsmál um lántøku til landskassan.*

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Føroya Løgting heitir á landsstýrið um at taka upp samráðingar við P/F Sjóvinnubankan við tí endamáli at varðveita P/F Sjóvinnubankan í verandi samstarvi við P/F Elektron.

# 94. Arbeiði til teirra, sum fáa arbeiðsloysisstuðul

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at taka upp samráðingar við kommunurnar og partarnar á arbeiðsmarknaðinum um eina skipan, so at tey, ið fáa arbeiðsloysisstuðul, kunnu fáa ávíst arbeiði, ið annars ikki verður gjørt, og part av stuðlinum sum løn fyri tað.

**Viðmerkingar:**

Í fjør varð stuðulin til arbeiðsleys fluttur frá Almannastovuni og forsorgarlógini, sum danir gjalda helvtina av, yvir til Arbeiðsloysisskipanina, sum løntakarin og arbeiðsgevarin gjalda hvør síni 2% til av allari útgoldnari løn.

Ein donsk útreiðsla upp á 11-12 mió. kr. árliga verður á tann hátt fyri tað mesta goldin av tí føroyska vinnulívinum.

Upplýst er, at tilsamans 130 mió. kr. vórðu goldnar út í stuðuli til arbeiðsleys í 1992. Bara í januar 1993 vóru útgoldnar 25 mió. kr. í arbeiðsloysisstuðuli.

Eftir núverandi skipan eiga øll, sum eru arbeiðsleys og hava havt lønandi vinnu tey seinastu 3 árini, at fáa pengar frá Arbeiðsloysisskipanini. Eftir gomlu skipanini fingu bara tey pengar frá forsorgarlógini, sum vóru í neyð m.a. vegna arbeiðsloysi.

Hin 18. mars 1992 legði Kristiligi fólkaflokkurin Føroya framburðs- og fiskivinnuflokkur fram uppskot á løgting um at broyta forsorgarlógina og avtaka galdandi málsviðgerð, so at eingin meira fær pengar fyri einki at gera. Víst varð til royndirnar hjá kommunum í Frederikshavn, har øll, ið fáa pengar frá almannaverkinum, samtíðis fáa boðið eitthvørt arbeiði so sum at hjálpa brekaðum, teimum gomlu og sjúku, verða send á skeið ella sett til okkurt arbeiði í vinnulívinum, har full løn ikki kann verða goldin.

Meirilutin á løgtingi samtykti at áleggja landsstýrinum at kanna møguleikarnar fyri eini líknandi skipan í Føroyum og arbeiða fram ímóti, at málsviðgerðir verða lagdar út til lokaðu økini. Hetta varð samtykt hin 9. apríl 1992, og síðan hevur landsstýrið verið í samráðingum við danir og fingið broytt forsorgarlógina, so at møguleiki har er til staðar.

Við tí høga talinum í huga, sum í 1992 er goldið út til arbeiðsleys, uttan at vinnulívið ella hitt almenna fær nakað av arbeiði gjørt aftur fyri, og út frá tí sjónarmiði, at dugur er í einum og hvørjum til okkurt, og at tað er gagnligast fyri øll at sleppa og virka við teimum evnunum, givin okkum eru, verður her bert sett uppskot fram til samtyktar um, at sama skipanin verður galdandi fyri Arbeiðsloysisskipanina sum fyri forsorgarlógina.

Ov mikið av arbeiði er, sum annars ikki verður gjørt, bæði hjá kommununum og landinum, vinnulívinum og privatum, sum tey, ið einki arbeiði hava, kunnu fáa ávíst at gera fyri t.d. 40% av tímaløn og hini 60%-ini av tímaløninni goldin frá Arbeiðsloysisskipanini. Eisini møguleikarnir fyri endurbúgving og skeiðvirksemi eiga at verða tiknir við, so at fólkið kann verða ment til at taka í móti teimum betru tíðunum, ið vónandi skjótt fara at koma við øktum útflutningsfremjandi virksemi bæði á sjógvi og landi.

Kommununar og vinnulívið eiga at verða tikin við, tí at tað er haðani pengarnir í Arbeiðsloysisskipanina koma.

## Álit

### í

*løgtingsmáli nr. 94/1992: Arbeiði til teirra, sum fáa arbeiðsloysisstuðul.*

Málið er lagt fram av Kristiliga fólkaflokkinum, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 9. februar 1993 og eftir 1. viðgerð 16. februar 1993 beint í arbeiðaramálanevndina.

Ein samd nevnd (Sverre Midjord, Hergeir Nielsen, Asbjørn Joensen, Birgir Danielsen, og Jógvan I. Olsen) vísir til avvarðandi orðingar um hesar spurningar í samgonguavtaluni millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldisflokkin og Sjálvstýrisflokkin og setir einki uppskot fram.

# 95. Stuðulstiltøk til avreiðing og virkan av rávøru her á landi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum sum skjótast at taka neyðug stig til, at rávøra úr havinum í størst møguligan mun verður avreidd og virkað her á landi.

**Viðmerkingar:**

Tá handilssáttmálin við Evropeiska Búskaparliga Felagsskapin (løgtingsmál nr. 13/1991) var til viðgerðar, førdi undirritaði í álitinum til nevnda mál m.a. fram soljóðandi:

"Hvat fiskivinnuni annars viðvíkur, er tað nógv sum bendir á, at tað fer at vera kærkomið hjá EF at fáa rávøru úr Føroyum til evropeiska fiskiídnaðin, og kann hetta lættliga gerast ein sonn vanlukka fyri 100 tals verkafólk, sum hava sítt dagliga yrki á flakavirkjum kring land okkara. Til tess at fyribyrgja eini slíkari møguligari gongd, verður neyðugt við politiskum tiltøkum...."

Ein setningur samgongunnar hevur sum kunnugt verið, at minka stuðulin - afturberingina - til fiskivinnuna, men tá sáttmálin við EF var til viðgerðar í tinginum, varð dentur lagdur á, at hesin kom at minka so líðandi.

Tí kann tað ikki annað enn undra, at so ógvusligar skerjingar nú eru framdar í afturberingini til fiskivinnuna, bert ár eftir at handilssáttmálin við EF varð undirritaður, og er stórur vandi fyri, at henda mannagongd beinleiðis verður samfelagsskaðilig og kemur at geva stórum parti av vinnuni mønustingin.

Frá landsstýrinum hevur verið sagt, at stuðul kann veitast aðrar vegir - og gott er, um so er!

Tí er tað eisini sera umráðandi, at landsstýrið sum skjótast virkar fyri, at føroyski fiski- og útróðrarmaðurin fær tað fyri vøruna, sum honum "tilkemur" og ikki hevur fyri neyðini at fara uttanlands at selja. Tí væl skiljandi verður selt har, sum mest er at fáa fyri vøruna!!

Tí er tað eisini umráðandi, at tá neyðug stig verða tikin til, at rávøra í størst møguligan mun verður at avreiða og viðgera her á landi, at fiski- og útróðrarmaðurin ikki tá kemur at liggja í "klemmu".

Í eini tíð, sum merkt er av stórum arbeiðsloysi og teim sosialu og menniskjaligu avleiðingunum, hetta hevur við sær, eigur landsstýrið at leggja alla orku í, at

tað tilfeingið, sum fæst til høldar í størst møguligan mun verður hagreitt og virkað á virkjum her á landi.

Møgulig ósemja í landsstýrinum/samgonguni eigur ikki longur at forða fyri loysn á hesum máli.

## Álit

í

*løgtingsmáli nr. 95/1992: Stuðulstiltøk til avreiðing og virkan av rávøru her á landi.*

Málið er lagt fram av Tordi J. Niclasen, løgtingsmanni, tann 11. februar 1993 og eftir 1. viðgerð 23. februar 1993 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og vísir á løgtingsmál nr. 81/1992: Uppskot til løgtingslóg um stuðul til feskfiskaflotan, sum varð endaliga samtykt við 3. viðgerð tann 26. februar 1993, har treytin fyri at fáa stuðul er, at fiskurin verður landaður í Føroyum. Ein onnur treyt fyri at fáa stuðul er, at minst 33% av veiðuni verða seld á uppboðssølu. Síðani februar mánað 1991 hevur telefonuppboðssølan virkað og fyrsta dagin byrjar ein gólvuppboðssøla. Ein uppboðssøla eigur at fáa ta ávirkan, at meira av fiski verður seldur til serframleiðslur og meira góðskaðar vørur og harvið skuldi eisini møguleiki verið fyri at fingið hægri prís. Ein samd nevnd tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

# 96. Loyvi til veiðu við húki á friðaðu økjunum norðanfyri og vestanfyri

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Landsstýrinum verður álagt saman við fiskivinnunevnd løgtingsins beinanvegin at geva loyvi til veiðu við húki á friðaðu økjunum á landleiðini norðanfyri og vestanfyri.

**Viðmerkingar:**

Landsstýrið og fiskivinnunevnd løgtingsins samtyktu í fjør at friða økið norðanfyri og vestanfyri fyri allari veiðu, bæði innan fyri 12 fj. og uttanfyri.

Útróðrarfeløgini vístu tá á, at landgrunnurin fær frið fyri útróðrarbátum 200 dagar um árið, og at tað tí er púra burturvið at friða uppaftur meira, hvat ið útróðrarbátunum viðvíkur.

Hjá teimum er talan um náttúrliga friðing, tí at ikki er royndandi fyri veðri, streymi og øðrum náttúrugivnum orsøkum.

Í heyst og vetur hava veðurlíkindi verið serliga ring, og lítið hevur verið at fáa eisini, so at inntøkan hjá útróðrarmonnum er cingin. Frá arbeiðsloysisgrunninum fáa teir heldur einki, sjálvt um teir gjalda inn í henda grunn sum øll onnur, og dupult so nógv, um teir sjálvir eiga bátin.

Landsstýrið og fiskivinnunevndin góvu í 1992 loyvi til, at nakrir bátar kundu royna við snellu og nakrir við línu á Føroya Banka, sum annars er friðaður fyri alla veiðu. Tað koin sera væl við hjá bátunum og eigur at verða tikið uppaftur í ár.

Á sama hátt eigur loyvi at verða givið til veiðu við húki á friðaðu økjunum norðanfyri og vestanfyri beinanvegin, tí at útróðrarmenn hava onga aðra staðir at fara.

**Álit**

**í**

*løgtingslóg nr. 96/1992: Loyvi til veiðu við húki á friðaðu økjunum norðanfyri og vestanfyri.*

Málið er lagt fram av Kristiliga fólkaflokkinum Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 11. februar 1993 og eftir 1. viðgerð 18. februar 1993 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og vísir á, at landsstýrið saman við fiskivinnunevndini hevur samtykt broyting í kunngerð um tíðaravmarkað veiðibann á gýtingarleiðum. Eisini verður víst á § 4 í løgtingslóg nr. 8 frá 29. mars 1978 um fiskiveiðu á landleiðini, ið er soljóðandi: "At skipa fyri fiskiskapinum við fiskiførum, sum hava heimstað og eru skrásett í kongaríkinum, er landsstýrinum eftir samráð við løgtingsins fiskivinnunevnd heimilað við kunngerð at áseta reglur um, hvussu fiskiskapur skal fremjast á landleiðini, tað er reglur um minstamát, friðað øki, friðingartíðir, fiskireiðskap og nýtslu teirra, fiskihættir, avmarking av veiðunøgd, avmarking av veiðuorku, aling og flyting av yngli og onnur tílík tiltøk". Út frá hesum tekur ein samd nevnd ikki undir við málinum, og setir tí einki uppskot fram.

# 97. Arbeiðsskapandi tiltøk í sambandi við umvælingar av sethúsum

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrinum at gera broytingar í løgtingslóg um ásetùng av skatti til landskassan samsvarandi hjáløgdu viðmerkingum galdandi fyri skattaárið frá og við 1993.

**Viðmerkingar:**

Ein høvuðstátturin í tí rikna skatta-, toll-, avgjalds- og okurspolitikkinum seinastu tvey árini hevur havt við sær, at fólk í hópatali missa síni hús, og at tað nú

bert er ein tíðarspurningur til tey, ið eiu hava tak yvir høvdið, fara av knóranum í einum stórum skrædli.

Afturat omanfyri nevnda politikki er ein samfelagsoyðandi meirvirðisgjaldsskipan sett í gildi í óðum verki. Henda skipan hevur havt, og kemur at hava við sær, at sethúsaeigarar ikki síggja seg førar fyri at gera nakrar umvælingar av tí 5-6 miljarda krónum stóra virði, sum er bundið í føroyska sethúsamarknaðinum.

Handverkarar, ið skulu liva av sínum yrki, ganga arbeiðsleysir, tí at eingin hevur ráð til at løna teimum, og vansarnir av hesum skeiva politikki eru m.a., at stórir fyrimunir liggja í svørtum arbeiði.

Hildið verður, at frádráttur fyri umvælingar av sethúsum hevur við sær, at 1) sethúsavirðini verða hildin við líka, 2) sethúsaeigarar fáa ein fíggjarligan lætta, 3) sethúsamarknaðurin fær eitt uppgangandi virði, 4) tørvurin á arbeiðsmegini innanfyri byggivirksemið økist, 5) svart arbeiði fær færri fyrimunir.

Hildið verður rímiligt, at helvtarfrádráttur verður givin fyri skjalprógvaðar útreiðslur fyri tilfar, og at fullur frádráttur verður givin av arbeiðsløn. Við hægri frádrátti fyri lønt arbeiði er ein tílík skipan meiri arbeiðsskapandi enn annars.

Eisini verður hildið rímiligt, at ein frádráttarskipan við t.d. føstum krónutali fyri fermeturin kann fylgja húsunum yvir eitt áramál, soleiðis at ráð vera til størri umvælingar.

Við møguligt eigaraskifti vil keypari av eldri húsum ikki halda seg aftur av hesi orsøk, men fáa ráð til at umvæla eini minni vælhildin hús.

Ovurstórur tørvur er á ábøtum á sethúsamarknaðinum, og samfelagssbúskaparliga sæð, so liggur ein vinningur í hesum uppskoti.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 97/1992: Arbeiðsskapandi tiltøk í sambandi við umvælingar av sethúsum.*

Málið er lagt fram av Tjóðveldisflokkinum tann 16. februar 1993 og eftir 1. viðgerð tann 18. mars 1993 beint í arbeiðaramálanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og umrøtt hevur verið á hvønn hátt, ætlaða tiltakið kann gerast um skattalógina, og er hetta ein spurningur, ið Toll- og Skattstova Føroya má lýsa og geva landsstýrinum nærri boð um.

Ein samd nevnd mælir til at samtykkja uppskot Tjóðveldisfloksins.

# 98. Broyting í løgtingslóg um alment kunngerðarblað

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um alment kunngerðarblað.*

*lagtingslov om ændring i lagtingslov om offentlig kundgørelsetidende.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 109 frá 17. desember 1987 um alment kunngerðarblað verður sett sum nýtt 2. stk. í § 2:

"Allar tær í 1. stk. nevndu kunngerðir, reglugerðir v.m. skulu avlýsast aftur í kunngerðarblaðnum hvørja ferð, ið nýggjar reglur samsvarandi 2. stk. a og b verða tiknar í nýtslu, men ikki lýstar."

2. stk. verður 3. stk.

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 109 af 17. december 1987 om offentligt kundgørelsestidende indsættes som nyt stk. 2 i § 2:

"Alle de i stk. 1 nævnte kundgørelser, reglementer m.m. skal aflyses igen i "Kunngerðarbladið" hver gang, nye regler i henhold til stk. 2 a og b tages i brug, men ikki kundgøres."

Stk. 2 bliver stk. 3.

**§ 2.**

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

**Viðmerkingar:**

Í løgtingslóg nr. 109 frá 17. desember 1987 um alment kunngerðarblað stendur í § 2:

"Í Kunngerðarblaðið skulu allar løgtingslógir og kunngerðir, reglugerðir og aðrar almennar fyriskipanir yvirhøvur, givnar av landsstýrinum, lýsast.

**2. stk.** *Í kunngerðarblaðið kunnu eisini upptakast:*

- **a.** Lýsingar, fráboðanir o.t. frá tí almenna.
- **b.** Kunngerðir, reglugerðir og aðrar almennar fyriskipanir yvirhøvur frá øðrum almennum stovnum enn landsstýrinum og fráboðanir frá privatum í rættarviðurskiftum."

Hetta merkir, at lýsingar, fráboðanir o.t. frá tí almenna, og kunngerðir, reglugerðir og aðrar almennar fyriskipanir yvirhøvur frá øðrum almennum stovnum enn landsstýrinum og frá privatum í rættarviðurskiftum ikki skulu lýsast, men kunnu lýsast.

Tað er ikki í lógartekstinum upplýst hvør, ið tekur avgerðina hesum viðvíkjandi.

Tað er heldur ikki í lógartekstinum sett nakað krav um, at eldri reglur skulu avlýsast aftur, tá ið aðrar ikki lýstar koma í gildi.

Henda ófullkomna skipan hevur ruðuleika við sær, og verður tí skotið upp at lóggeva fyri skipaðum viðurskiftum á hesum øki.

## Álit

### í

*løgtingsmáli nr. 98/1992: Broyting í løgtingslóg um almennt kunngerðarblað.*

Málið er lagt fram av Tjóðveldisflokkinum 16. februar 1993 og eftir 1. viðgerð tann 18. februar 1993 beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, sum snýr seg um tulkingina av § 2 í løgtingslóg nr. 109 frá 17. desember 1987 um almennt kunngerðarblað. Uppskotsstillarin er av teirri áskoðan, at nevnda regla ikki er vorðin beint umsitin av landsstýrinum, at skipanin hevur borið ruðuleika við sær, og er tí sum ein møguleiki skotið upp, at lóggeva fyri skipaðum viðurskiftum á hesum øki. Undir viðgerðini hevur nevndin lagt dent á at fáa greiðu á beina týdningin av nevndu § 2 í løgtingslóg nr. 109.

Rættarnevndin hevur frá lógardeildini í Tinganesi fingið eina skrivliga frágreiðing um galdandi reglur.

Nevndin er av teirri uppfatan, at undanfarna landsstýrið ikki hevur umsitið lógina um almennt kunngerðarblað á rættan hátt og hevur ikki fylgt § 2 í lógini soleiðis, at lýsingar, fráboðanir og avlýsingar av kunngerðum, reglugerðum v.m. skulu lýsast í almenna kunngerðarblaðnum. Fyri borgaran fyrst og fremst er tað ein ótryggleiki, at verða galdandi reglur ikki lýstar, so er borgarin ikki vitandi um, hvat er galdandi, og tað skal hann fáa høvi til at kunna seg um.

Løgtingsgrannskoðararnir hava í áliti teirra um Strandfaraskip Landsins, dagfest 18. februar 1993, átalað, at virkað hevur verið eftir eini reglugerð, ið ikki er lýst sambært lóg um almennt kunngerðarblað, og tekur rættarnevnd løgtingsins undir við hesi átalu.

Samsvarandi hesum er ikki neyðugt at fremja fyriliggjandi uppskot um lógarbroyting í løgtingslóg um almennt kunngerðarblað.

# 99. Skatting av hjúnum við helvtarbýti

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum beinanvegin at fyrireika og leggja fyri løgtingið uppskot um broyting í skattalógini soleiðis, at heimaarbeiðandi hjúnafelagin verður skattaður við helvtini av samlaðu inntøkuni hjá báðum hjúnafeløgunum.

**Viðmerkingar:**

Sitandi landsstýri má sigast at hava ført ein miðvísan politikk móti øllum tí, sum kann stuðla teimum veiku, børnunum og familjuni.

Tær flestu familjupolitisku lógirnar, sum samtyktar vóru í tíðarskeiðinum 1985-88, so sum lógin um barnastyrk, barsilsorlov til heimaarbeiðandi v.m. eru soleiðis avtiknar undir hesum landsstýrinum.

Um somu tíð er MVG-gjald lagt á alt tað, sum børn brúka, hava til matna og klædna, meðan bøkur, bankaboksir og útlendskar gistingar sleppa undan MVG-gjaldi.

ST-samtyktin um mannarættindi § 16, stk. 3, sigur "familjuna vera hin natúrliga og grundleggjandi eindarbólkin í samfelagnum, sum tí hevur krav upp á verju samfelagsins og ríkisins".

Í hesum krepputíðum, sum hava rakt samfelag okkara, er tað umráðandi, at familjan verður styrkt og heimini stuðlaði so tey kunnu verða smáar borgir, ið verja hin einstaka og geva honum ta barlast í lívinum, sum kann hjálpa okkum at koma heilskapað ígjøgnum tær ringu tíðimar.

Kristiligi fólkaflokkurin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokkur legði seinastu tingsetu uppskot sítt fram aftur um at skatta hjún við helvtarbýti, sum kann gera tað, at hjún aftur verða betri før fyri at liva av einari inntøku, og meiri pláss soleiðis verður á arbeiðsmarknaðinum fyri tey nógvu arbeiðsleysu.

Í álitinum frá 8. apríl 1992 sigur skattanevndin seg hava havt fund við Jógvan Sundstein, landsstýrismann í fíggjarmálum, sum upplýsti, at "arbeitt verður við lógaruppskoti, sum í fyrstu atløgu skapar grundarlag fyri, at hjún verða skattað hvør sær, og at hetta uppskot verður lagt fram í ólavsøkutingsetuni 1992".

Henda tingseta lækkar nú móti enda, og frá landsstýrismanninum eru cingi lógaruppskot komin, ið bera á tann bógvin, sum upplýst varð fyri skattanevndini

í fjør. Løgtingsformaðurin hevur sett seinasta framløgudag til at vera hin 4. mars 1993, og fyri at hetta týdningarmikla mál ikki skal detta burturímillum, loyvir flokkurin sær at taka uppskotið fram aftur, og vilja vit gera tað, til ein loysn er fingin á hesum átrokandi máli.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 99/1992: Skatting av hjúnum við helvtarbýti*

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 16. februar 1993 og eftir 1. viðgerð tann 16. mars 1993 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jacob Lindenskov, Heini O. Heinesen og Lasse Klein) setir einki uppskot fram, men ger vart við, at ein umskipan av skattalógini, sum uppskotið miðar ímóti, at skatta hjún við helvtarbýti, kostar landskassanum stóra peningaupphædd, sum illa fer at bera til at útvega undir verandi peningaványum.

Minnilutin (Bjarni Djurholm) tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Finnbogi Arge) førir fram, at uppskot um at broyta skattalógina soleiðis, at heimaarbeiðandi hjúnarfelagin verður skattaður við helvtini av inntøkuni, upprunaliga er sett fram av Sambandsflokkinum, men tingmanning Sambandsfloksins heldur ikki, at tað ger so nógv, at aðrir flokkar á tingi leggja fram somu uppskot, sum sambandsflokkurin hevur átt. Tvørturímóti, tí flokkurin fegnast um, at sjónarmiðini vinna frama og at undirtøkan veksur.

Minnilutin tekur í prinsippinum undir við málinum, men ásannar, at uppskotið ikki kann gjøgnumførast uttan so, at landskassin fær mistu inntøkuna á annan hátt.

# 101. Umleggingarstudningur til feskfiskaflotan í sambandi við nýggjar veiðumøguleikar

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Landsstýrinum verður álagt at finna útvegir fyri og koma við uppskoti um umleggingarstudning til feskfiskaflotan, so at arbeiðspláss kunnu verða varðveitt, og skip leggja um til fiskiskap eftir øðrum fiskasløgum, sum bert lítið verður roynt eftir sum havtasku við gørnum, svartkjafti, gulllaksi, búrfiski, krabba, kongafiski í Irmingarhavinum og ídnaðarfiski í Norðsjónum.

**Viðmerkingar:**

Landsstýrið hevur lagt fram uppskot um ein tíðaravmarkaðan, umsetiligan íløgustudning til eitt avmarkað tal av feskfiskiførum yvir 20 brt.

Hetta uppskot miðar í móti at minka um veiðiflotan og laga hann eftir tilfeingi-num.

Veiðuorkan eftir botnfiski undir Føroyum er ov stór, sum sæst eina best av samlaðu veiðitølunum tey seinastu árini.

Hagdeildin hevur hesi tøl fyri tosk og hýsu. 1992 eru fyribilstøl:

| | **1989** | **1990** | **1991** | **1992** |
|---|---|---|---|---|
| Toskur | 23.033 tons | 13.520 tons | 9.388 tons | 6.800 tons |
| Hýsa | 14.168 tons | 11.476 tons | 8.599 tons | 4.800 tons |

Tað man hava verið skelkandi tøl sum hesi, ið fingu ráðgevandi nevndina (ACFM) hjá ICES í fjør at mæla til at gevast við veiðu eftir toski og hýsu á Føroyagrunninum.

Tilmæli frá okkara egnu fiskifrøðingum í 1991 var øðrvísi. Fiskirannsóknarstovan metti tá, at vit fóru at kunna veiða 18.000 tons av toski. Eftir árslok vísir uppgerðin nú, at veiðan var tríggjar ferðir minni ella bara 6.800 tons.

Nú er neyvan nakar longur, sum ivast í, at veiðuorkan hjá okkum eftir botnfiskasløgum er ov stór.

Uppskotið hjá landsstýrinum minkar um veiðiflotan og førir til arbeiðsloysi millum fiskimenn, sum vit hava nóg mikið av frammanundan, og sum vit tí mugu gera alt, ið gerast kann og rúmiligt er fyri at sleppa undan.

Tí eigur eisini at verða hugsað um møguleikarnar at royna eftir øðrum fiskasløgum, sum nú bert verður roynt lítið eftir, og at stuðla skipum til at leggja um til tílíkan fiskiskap. Á tann hátt ber til at økja um útflutningin og varðveita arbeiðspláss á sjónum.

Í ársfrágreiðingini hjá Føroya Fiskimannafelag fyri 1992 nevnir formaðurin, Óli Jacobsen, fleiri tílíkar møguleikar sum veiðu eftir havtasku við gørnum, ið tók seg upp í Føroyum. eftir at spanskur veiðitjóvur varð tikin innan fyri mark, og tað vísti seg, at hann hevði fiskað havtasku við gørnum. Tvey føroysk skip hava síðani verið á hesi veiðu, og frætt er um, at fiskiloyvi er givið tveimum skipum afturat í ár.

Svartkjaftaveiðan hjá føroyskum skipum, sum stórar vónir einaferð vórðu settar til, minkaði í 1991 niður í einki, úr 5.446 tonsum í 1990 niður til 193 tons í 1991. Fyri 1992 er veiðan eftir svartkjafti lítið frægari enn 1991, bara 1.196 tons, sjálvt um veiða eftir hesum fiski var ein av treytunum, teir fingu, sum í fjør keyptu hin síðsta stóra svartkjaftatrolaran í føroyska flotanum.

Eisini har eru møgulcikar, sum eiga at verða troyttir. tí at svartkjafturin er á føroyskum sjóøki og kann verða fiskaður bæði til matna og til ídnað, og kann hann bæði landast óviðgjørdur og virkast umborð. Norðmenn hava framvegis verksmiðjuskip á svartkjaftaveiðu, sum eftir øllum at døma fáa nýtilig úrslit, umframt skipini úr Russlandi og teimum baltisku londunum, sum royna á okkara leiðum.

Víst kann eisini verða til fiskiskap eftir gulllaksi, búrfiski, krabba, kongafiski í Irmingarhavinum og kvotuna av ídnaðarfiski í Norðsjónum, sum ikki verður uppfiskað.

Á fíggjarlógini fyri 1993 er játtanin til praktiskar fiskiroyndir minkað úr 5,1 kr. niður til 4,1 mió., sum er púra óskiljandi, nú ið vit hava meiri brúk fyri royndum eftir øðrum fiskasløgum enn teimum vanligu og nýggjum fiskileiðum.

Tí verður ivaleyst neyðugt at finna aðrar útvegir fyri at fíggja umleggingina til nevnda fiskiskap og studningin.

Tað gongst striltið hjá skipunum í løtuni at sleppa av við fongin í Føroyum, og kunnu tí kanska nakrar av teimum 23 mió. kr., sum játtaðar eru á fíggjarlógini í ár undir § 18 til innflyting av fiski, verða nýttar til arbeiðsskapandi tiltøk og vørumenning umborð á skipunum.

## Álit

í

*løgtingsmáli nr. 101/1992: Umleggingarstudningur til feskfiskaflotan í samband við nýggjar veiðumøguleikar*

Málið er lagt fram av Niels Paula Danielsen, løgtingsmanni, tann 18. februar 1992 og eftir 1. viðgerð tann 26. februar beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og kann ikki taka undir við fyriliggjandi uppskoti. Løgtingið hevur samtykt løgtingslóg um íløgustuðul til feskfiskaflotan, og vísir nevndin eisini til at tær í hesum løgtingsmáli umrøddu praktisku fiskiroyndirnar verða gjørdar. Sostatt tekur fíggjarnevndin ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

# 102. Løgtingslóg um ábyrgd fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m. á goymslu

## Uppskot

til

*løgtingslóg um ábyrgd fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m. á goymslu.*

**§ 1.**

Landsstýrinum er heimilað landskassans vegna í fíggjarárinum 1993 at borga sum einfaldur borgsmaður fyri lánum til fiskamjøl, lýsi, úrdráttir av svartkjafti og agn á goymslu. Borgan verður givin fyri lánum ikki upp um 70% av lánsvirðinum.

**§ 2.**

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

*lagtingslov om garanti for lån til fiskemel og animalsk olie m.v. på lager.*

**§ 1.**

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne i finansåret 1993 at kautionere med simpel kaution for lån til fiskemel, animalsk olie, produkter af blåhvilling og agn på lager. Kautionen ydes for lån, der ikke må overstige 70% af lånsværdien.

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse

**Viðmerkingar:**

Uppskotið er samsvarandi løgtingslóg nr. 35 frá 27. mars 1992, sum er broytt við løgtingslóg nr. 54 frá 28. apríl 1992, sum fór úr gildi 31. desember 1992, sí løgtingsmál nr. 72/1991. Tó eru niðursjóðingarvirkir, fiskaroykivirkir og tøtingarvirkir ikki umfatað av lógaruppskotinum.

Víst verður annars til viðmerkingar frá landsstýrinum í løgtingsmáli nr. 54/1975, Løgtingstíðindi 1975, bls. 231.

Í fíggjarárinum 1992 eru borganir veittar fyri 27 mió. kr. til fiskamjøl og lýsi á goymslu.

## Álit

### í

*løgtingsmáli nr. 102/1992: Løgtingslóg um ábyrgd fyri lánum til fiskamjøl, lýsi v.m. á goymslu.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 23. februar 1992 og eftir 1. viðgerð tann 26. februar beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og mælir ein meiriluti (Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Anfinn Kallsberg, Birgir Danielsen, Finnbogi Arge og Asbjørn Joensen) tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein minniluti (Heini O. Heinesen) viðmerkir, at sum støðan í samfelagnum er í dag, har stórur partur av rávøru fer óvirkaður av landinum og likviditeturin er sera tepur, er tað ein spurningur, um ikki landskassin skuldi veitt veðhald fyri øðrum rávørum enn teimum, ið umrøddar eru í § 1 í uppskoti landsstýrisins, eitt nú til keyp av rávørum til flakavirkini, og kann hetta eisini virka til at minka um arbeiðsloysið. Nevndi minniluti vísir annars til viðmerkingar sínar undir 1. viðgerð í tinginum og tekur støðu í tingsalinum.

# 103. Ígildissetan fyri Føroyar av "Varemærkelov" og "Fællesmærkelov"

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið samtykkir, at lóg nr. 341 frá 6. juni 1991 "om varemærker" og lóg nr. 342 frá 6. juni 1991 "om fællesmærker" verður sett í gildi fyri Føroyar, sum skotið upp av Ídnaðarmálaráðnum.

**Viðmerkingar:**

Ídnaðarmálaráðið hevur spurt eftir landsstýrisins støðutakan til, at lóg nr. 341 frá 6. juni 1991 ("Varemærkelov") og lóg nr. 342 frá 6. juni 1991 ("Fællesmærkelov") verða settar í gildi í Føroyum. Lógirnar avloysa ávikavist "Varemærkelov" og "Fællesmærkelov", sum vórðu settar í gildi í Føroyum tann 30. august 1963.

Lógirnar eru gjørdar við tí endamáli at gjøgnumføra eitt EF-direktiv um harmonisering av lógunum um vørumerkir í ymsu limalondunum, umframt at vanligar dagføringar eru framdar.

Størstu broytingarnar í mun til galdandi lógir eru:

1) reglur um nýtsluskyldu, sum áseta, at rætturin til vørumerkir, sum ikki hava verið nýtt í einum 5-ára skeiði, dettur burtur,
2) at einkarrætturin til vørumerkir, sum eru vælkend, er galdandi fyri allar vørur, og ikki bert fyri vørur av sama slagi, ella sum líkjast teimum, sum eru umfataðar av vørumerkjarættinum,
3) reglur um "konsumptión", t.e. at rættindishavari til vørumerki ikki kann seta seg ímóti, at merktar vørur, sum við hansara góðkenning eru latnar handlum, verða seldar víðari undir sama merki,
4) at møguleiki verður fyri at fáa millumtjóða vernd av merki, sum er skrásett í serligari millumtjóðaskrá og
5) strangari reglur fyri brot á vørumerkjarættindir.
6) Herumframt eru eisini onkrar broytingar, sum ætlaðar eru at lætta um umsitingina av lógini, t.d. at skrásetingin verður gjørd uttan kunngerð av merki-

num frammanundan góðkenningini, tó soleiðis at høvi verður at mótmæla í upp til 2 mánaðir aftaná, at endaliga góðkenningin er kunngjørd.

Mælt verður til at lógirnar verða settar í gildi fyri Føroyar, sum skotið upp av ídnaðarmálaráðnum.

**Álit**

**í**

*løgtingsmáli nr. 103/1992: Ígildissetan fyri Føroyar av "Varemærkelov" og "Fællesmærkelov".*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 23. februar 1993 og eftir 1. viðgerð 26. februar 1993 beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og mælir ein meiriluti (Mikkjal Sørensen, Bjarni Djurholm, Essa Arge og Eilif Samuelsen) til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein minniluti (Signar Hansen) tekur støðu í tingsalinum.

# 104. Løgtingslóg um lántøku til landskassan

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um lántøku til landskassan.*

**§ 1.**

Landsstýrið verður landskassans vegna heimilað at taka lán til eina samlaða upphædd svarandi upp til 36 mió. kr.

**§ 2.**

Henda lóg kemur í gildi, dagin eftir at hon er kunngjørd.

*lagtingslov om optagelse af lån til landskassen.*

**§ 1.**

Landsstyret bemyndiges til landskassens vegna at optage lån til et samlet beløb, der svarer op til 36 mio. kr.

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft, dagen efter dens bekendtgørelse.

**Viðmerkingar:**

Fallin effektiv veðhald í føroysku peningastovnunum eru vaksin nógv í 1992. Hetta eru veðhaldslán hjá skipum og virkjum, ið eru farin á húsagang og seld á tvingsilssølu. Á fíggjarlógini fyri 1992 vórðu játtaðar 190 mió. kr. til effektiv veðhald. Tó var skjótt greitt, at um øll tey falnu veðhaldini í 1992, nevniliga 226 mió. kr., skuldu umleggjast til lán, vantaði lániheimild til hesar kr. 36 mió., ið vóru játtaðar á eykafíggjarlógini fyri 1992. Landsstýrinum vantar tí heimild til at upptaka lán, stórt 36 mió. kr. Hjálagt er avrit av skjali frá Landsbankanum, ið vísir, at heimild er bert eftir at læna 6,1 mió. kr.

Samb. § 1 í løgtingslóg nr. 116 frá 20. desember 1991 um lántøku til landskassan og um umlegging av landskassalánum hevur landstýrið altíð heimild til endurfígging av heilt ella partvís afturgoldnum lánum.

Verður uppskotið samtykt, gevur hetta sostatt landsstýrinum heimild til at økja samlaðu skuld landskassans við 36 mió. kr.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 104/1992: Løgtingslóg um lántøku til landskassan.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 23. februar 1993 og eftir 1. viðgerð tann 9. mars 1993 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tríggjar minnilutar.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Heini Johansen, Anfinn Kallsberg og Birgir Danielsen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Edmund Joensen) tekur støðu í tingsalinum.

Minnilutin (Heini O. Heinesen) tekur støðu í tingsalinum.

Minnilutin (Asbjørn Joensen) tekur støðu í tingsalínum.

# 105. Broyting í løgtingslóg um arbeiðaravernd

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðaravernd.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 58 frá 24. mai 1974 um arbeiðaravernd við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 40 verður orðað soleiðis:
"§ 40. Arbeiðseftirlitið innkrevur gjøld fyri tænastur sínar.

**Stk. 2.** Tey í stk. 1 nevndu gjøld skulu góðkennast av landsstýrinum.

**Stk. 3.** Frammanfyri nevndu gjøld kunnu krevjast inn við panting."

2) §§ 40 og 41 verða hereftir ávikavist § 41 og § 42.

**§ 2.**

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

*lagtingslov om ændring i lagtingslov om arbejderbeskyttelse.*

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 58 af 24. maj 1974 om arbejderbeskyttelse med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) § 40 affattes således:
"§ 40. Arbejdstilsynet opkræver afgifter for sine tjenester.

**Stk. 2.** De i stk. 1 nævnte afgifter skal godkendes af landsstyret.

**Stk. 3.** Forannævnte afgifter kan indkræves ved pantning".

2) §§ 40 og 41 bliver herefter henholdsvis § 41 og § 42.

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

**Viðmerkingar:**

Viðmerkingar til tær einstøku broytingarnar:

**ad § 1.** Skotið verður upp, at Arbeiðseftirlitið skal innkrevja gjøld fyri tænastur sínar og at hesi skulu góðkennast av landsstýrinum. Talan er um tænastur, sum gjørdar verða sambært lógini um arbeiðaravernd og aðrar tænastur. Skotið verður upp, at gjøld fyri tænastur kunnu krevjast inn við panting.

**Álit**

**í**

*løgtingsmáli nr. 105/1992: Broyting í løgtingslóg um arbeiðaravernd.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 23. februar 1993 og eftir 1. viðgerð tann 16. mars 1993 beint í arbeiðaramálanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið. Síðani málið varð lagt fram, hevur Arbeiðseftirlitið í skrivi frá 18. mars 1993 greitt nágreiniligari frá málinum, og vísir Arbeiðseftirlitið á, at talan ikki er um at taka gjald fyri vanligt eftirlitsarbeiðið sambært arbeiðaraverndarlógini, men at talan er um gjøld fyri aðrar tekniskar tænastur og sýn, sum stovnurin ger og hevur gjørt síðani 1960-ini, tá stovnurin var ein partur av teknisku deild landsstýrisins. Sostatt er endamálið við lógarbroytingini bert at seta tingini upp á pláss og fáa heimildina í lagi, sum kanska í løtuni er ivasom, tí innkrevjingin í fleiri førum hevur verið gjørd eftir donskum kunngerðum. Nevndu inntøkur hava gjøgnum øll árini verið ein partur av fíggjarætlanini hjá arbeiðseftirlitinum, sum hvørt ár hevur verið góðkend av fíggjarnevndini hjá løgtinginum. Aðrir almennir stovnar hava fingið loyvi at tikið gjald fyri teirra arbeiði t.d. Heilsufrøðiliga Starvsstovan, Bileftirlitið og Radioeftirlitið.

Ein samd nevnd mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

# 106. Skipan millum Føroyar og Ísland um sínámillum fiskirættindi í 1993

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið tekur til eftirtektar úrslitið av samráðingunum í Reykjavík 16. - 17. november 1992 millum Føroyar og Ísland um sínámillum fiskiveiðu í 1993, ið var soljóðandi:

Føroysk skip kunnu veiða 6.000 tons av botnfiski, harav 700 tons kann vera toskur og 400 tons kalvi, meðan íslendsk skip kunnu veiða tilsamans 2000 tons

av sild og 1000 tons av makreli á føroyskum øki. Loyvt verður 12 føroyskum línuskipum í senn at veiða undir Íslandi.

**Viðmerkingar:**

Á fundinum í Reykjavík tann 16. - 17. november 1992 luttóku fyri Føroyar: John Petersen, landsstýrismaður og Kjartan Hoydal, fiskivinnustjóri.

Fyri Ísland luttóku: Torsteinn Pálsson, fiskimálaráðharri, Árni Kolbeinsson, ráðharrastjóri, Jón B. Jónasson, deildarleiðari, Jákup Jakobsen, stjóri Hafrannsóknarstofnurinn og Guðmundur Eiriksson, uttanríkisráðið.

Áðrenn fundin varð tilfar fyri føroysku veiðuna undir Íslandi eftir botnfiski og undir Eysturgrønlandi eftir lodnu framlagt. Ísland veiddi einki undir Føroyum í farna ári. Fundurin viðgjørdi eisini niðanfyri standandi:

**1. Samvinna um havrannsóknir.**

Umrøtt varð tað samstarv, sum var við Fiskirannsóknarstovuna og eisini Havforskningsinstituttet í Bergen um kongafisk. Íslendska sendinevndin greiddi frá stóru nøgdarkanningunum av úthavskongafiski saman við russum, sum høvdu økt stovnsmetingina av stovninum munandi. Hon spurdi, um føroyska luttøku í hesum kanningum. Hon skeyt eisini upp, at Føroyar og Ísland saman kannaðu Norðhavið fyri sild komandi summar.

Eisini varð samstarv um gulllaks umtalað.

**2. Samvinna um felags fiskastovnar.**

Ísland vísti á, at talan var um tvey sløg av stovnum. Teir, sum kundu viðgerast tvey- ella trývegis og teir, sum vóru umrøddir í NEAFC. Viðvíkjandi teimum fyrru (kongafiskur, svartkalvi, longa og brosma) var vísindaliga tilfarið frá ICES ikki nóg gott til at kunna leggjast til grund fyri felags umsiting. Viðvíkjandi stovnum, sum vórðu umrøddir í NEAFC, so fór Ísland ikki í ár at krevja støðutakan um heildarkvotu fyri úthavskongafiskin. Viðvíkjandi sild fóru teir at skjóta upp, at veiðan ikki øktist fyrr enn teir 3 seinastu góðu árgangirnir komu inn á gýtingarstovnin.

**3. Samstarv um at gagnnýta kóp og hval.**

Støðan í NAMMCO varð stutt umrødd. Bíðað verður eftir, at norðmenn bjóða fram avtalu um skattaviðurskifti. Áðrenn hetta hendir, er ikki møguligt at lýsa eftir fólki. Vísindanevndin er nú vald, og uppskot til arbeiðsreglur fyri hana eru gjørdar. Nógv hevur verið skrivað um NAMMCO í heimspressuni. Føroyar reistu spurningin um at standa saman móti boykott-hóttanum. Semja var um, at heitast skuldi á útflutningsfyritøkurnar um at standa saman móti "avpressings" roynduni frá umhvørvisfelagsskapum.

**4. Binding Føroya í spurninginum um laksaveiðu undir Føroyum.**
Avtalan um endurgjald heldur áfram í 1993. Greitt varð frá samstarvinum millum Noreg og Føroyar um at merkja laks.

**5. Góðkenning av beinleiðis landingum hjá íslendskum skipum í Føroyum.**
Tvey ting hava forðað hesum. Ísland hevur bert góðkent gólvuppboðssølur til beinleiðis landingar uttanlands. Hitt er stóri føroyski prísstuðulin. Føroyska sendinevndin minti á handilsavtaluna og reglur hennara um kappingaravlagandi stuðul. Greitt varð frá, at Føroyar avtaka vanliga prísískoytið frá nýggjárinum. Upp á beinleiðis spurning, um allur stuðul skuldi vera burtur, áðrenn landingar í Føroyum verða góðkendar, segði Torsteinn Pálsson, at hann metti, at um studningurin varð nógv lækkaður og gólvuppboðssølan var komin, so helt hann, at teir kundu fara undir góðkenning. Greitt varð frá nýggju innvigingarskipanargóðkenningini í Føroyum og eftirlitið við henni. Í Íslandi hava havnamyndugleikarnir ábyrgdina av innvigingini. Á uppboðssølum í útlandinum góðkenna íslendskir myndugleikar skipanina, hava samband við eitt fólk á staðnum og senda regluliga eftirlitsfólk úr Íslandi at gera stakroyndir. Kravt verður, at øll veiðan verður vigað.

**6. Gráa leiðin millum Føroyar og Ísland.**
Føroyar løgdu fram tilfar um føroyskan fiskiskap á hesi leið, og hvussu føroyskt veiðieftirlit fór fram á gráum leiðum. Talan er um tvey kongafiskatóg. Ísland hevði sett niður ein bólk at kanna henda spurning, aftan á at eitt vaktarskip var farið í fjølmiðlarnar um ólógligan føroyskan fiskiskap her. Semja var millum partarnar um, at hvørgin partur broytir nakran praksis uttan at boða hinum frá.

**7. Sínámillum veiðimøguleikar í 1993.**
Føroyar løgdu dent á, at í minsta lagi at varðveita somu veiðirættindi í 1993. Víst varð á, at íslendska kvotan kundi vera upp til 40-50% hjá teimum førum, sum høvdu íslandsloyvi. Eisini hevði tað týdning at fáa veiðimøguleikarnar greindar, so at vitan um hetta kundi takast við í fyrireikingini av fíggjarlógini. Ísland ynskti at fasthalda møguleikan at veiða 2.000 tons av sild og 1.000 tons av makreli.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 106/1992: Skipan millum Føroyar og Ísland um sínámillum fiskirættindi í 1993.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 23. februar 1993 og eftir 1. viðgerð 10. mars 1993 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Eyðun Viderø, Sverre Midjord, Sommer Winther og Jógvan á Lakjuni) tekur undir við uppskoti landsstýrisins.

Ein minniluti (Edmund Joensen, Helena Dam á Neystabø og Hergeir Nielsen) tekur undir við málinum, men mælir til, at niðanfyristandandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Føroya Løgting samtykkir at avtala millum Ísland og Føroyar um binding Føroya í spurninginum um laksaveiðu undir Føroyum, verður ikki lougd aftan á 1993.

# 107. M/f "Ternan" til privat og/ella kommunalt felag, ið fær loyvi til farma- og ferðafólkaflutning millum Klaksvík og meginøkið (Leirvík/Fuglafjørð)

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Landsstýrinum verður heimilað at lata m/f "Ternuna" til privat og/ella kommunalt felag í Norðoyggjum og veita felagnum loyvi til farma- og fólkaflutning millum Klaksvík og meginøkið (Leirvík/Fuglafjørð) við ásettum túratali og góðkendum prísi.

**Viðmerkingar:**

Uppskot er aftur komið á landsstýrisborð um at minka túratalið hjá "Ternuni" um Leirvíksfjørð og gevast heilt við siglingini um kvøldarnar, soleiðis at 6.000 fólk í Norðoyggjum ongan veg sleppa úr Klaksvík eftir klokkan 6.

Á tann hátt slepst undan av hava 3 manningar sum í dag, nú ið 5 menn eru á hvørjari vakt, sjálvt um manningarlógin krevur 6. Við færri túrum ber til at sigla við 2 manningum, sum tá mugu hava yvirtíð.

Tað vil hvørki gagna vinnulívinum, fólki ella tí almenna at minka um túratalið hjá "Ternuni" og taka møguleikarnar burtur fyri at ferðast um kvøldarnar. Gamla feðasambandið millum Klaksvík og Havnina er eisini skorið niður í einki. Tað gevur eisini skipinum minni av inntøku.

Tað mátti verið bæði bíligari og betri at siglt um kvøldarnar, serliga um summarið og havt 3 manningar og onga yvirtíð heldur enn at reka triðingin av manningini út í arbeiðsloysi, sum vit hava nóg mikið av frammanundan.

Og so hevur siglingin hjá "Ternuni" um Leirvíksfjørð givið yvirskot alt tað, upplýst er. Tey seinastu 3 árini hevur yvirskotið verið smb. løgtingsgrannskoðarunum:

**1989:** 1,7 mió. kr.
**1990:** 1,8 mió. kr.
**1991:** 4,4 mió. kr.

Yvirskotið fyri 1992 verður mett at verða tað sama sum fyri 1991.

Tað er bara m/f "Sam" av skipunum hjá Strandferðsluni, sum eins og "Teman" hevur yvirskot av sigling síni. Øll hini skipini sigla við undirskoti. Eisini har er skotið upp at minka um túratalið.

"Sam" flytir fólk og farm m.a. í samband við flogferðsluna til og úr Føroyum, meðan "Teman" tekur sær av flutninginum hjá teimum, sum hava ørindi í Norðoyggjum, og ongum øðrum.

Tær 4-5 mió. kr., sum "Teman" gevur í yvirskoti, halda menn seg hava brúk fyri í Norðoyggjum, har kapitalur trýtur til at seta gongd á aftur vinnulívið, ið er fullkomiliga steðgað upp. Tikið verður t.d. ikki ímóti fiski í Klaksvík, sum fyri fáum árum síðani var høvuðsfiskivinnustaðurin í Føroyum. Størsta fyritøkan, "Kósavirkið", verður selt á tvingsilssølu í dag

Tað er góður setningur at seta sær at minka um skrivstovuveldið, sum er savnað í høvuðsstaðnum, og sum eitt nú løgtingsgrannskoðararnir siga lítið skil vera á. Teir átala m.a. meimýtslu hjá Strandferðsluni uttan játtan og mótmæla lántøku, ið eingin lógarheimild er fyri.

Ein háttur at minka um hesar skrivstovuútreiðslur og fáa betur skil á er at liberalisera og flyta virksemið hjá Strandferðsluni nærri teimum, ið brúka tænastuna, ið veitt verður.

Farleiðin um Leirvíksfjørð hevur fyrr verið rikin av privatum felagi, sum fólk vóru væl nøgd við, og kann landsstýrið ikki tryggja norðoyingum gott samband við meginøkið á morgni eins væl og á degi og kvøldi, eigur tað sama tilboð at

verða givið norðoyingum, sum eysturoyingar hava fingið frá landsstýrinum, og skipið latið privatum og/ella kommunalum felagi at reka við greitt ásettum túratali, ið á ongan hátt má verða niinni enn í dag og góðkenning av ferðascðlaprísi, sum væl tolir at verða lækkaður.

Tað er átaluvert, at landsstýrið hevur okrað við prísinum hjá fólki um Leirvíksfjørð, fyri at fáa yvirskotið uppaftur størri, og tað líkist mest av øllum einari herferð móti fólkinum, ið búleikast í Norðoyggjum, tá ið hugsað verður um undirskotið á øðrum rutum.

"Ternan" er 427,9 br. reg. tons og varð bygd á Tórshavnar Skipasmiðju í 1980 úr stáli.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 107/1992: Mlf "Ternan" til privat og/ella kommunalt felag, ið fær loyvi til farmu- og ferðafólkaflutning millum Klaksvík og meginøkið (Leirvík/Fuglafjørð).*

Málið er lagt fram av Niels Paula Danielsen tann 26. februar 1993 og eftir 1. viðgerð 16. mars 1993 beint í samferðslunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið.

Málið snýr seg um, at landsstýrinum verður heimilað at lata m/f "Ternan" til privat og/ella kommunalt felag í Norðoyum.

Við tølum, sum eru staðfest sambært løgtingsgrannskoðarunum, verður víst á ávíst yvirskot árini 1989 - 1991.

Nevndin ásannar, at fíggjarkarmurin um raksturin hjá Strandferðsluni er treytaður av roknaðum yvirskoti hjá Terniuni, og tí ber ikki til at taka partar burtur úr hesum stovni uttan samstundis at taka hædd fyri fylgjunum.

Skal talan verða um tílíkar broytingar innan strandferðsluna, so má talan verða um at privatisera allan stovnin, men hesin spurningur er ikki frammi í løtuni.

Ein samd nevnd tekur tí ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

# 108. Forboð móti handli v.m. við Serbia og Montenegro ("Sambandstjóðveldið Jugoslavia")

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um forboð móti handli v.m. við Serbia og Montenegro ("Sambandstjóðveidið Jugoslavia").*

**§ 1.**

Danskir ríkisborgarar, búsitandi í Føroyum, ella skip og flogfør, skrásett í Føroyum, ella sum danskir ríkisborgarar ella feløg eiga ella hava leigað, kunnu ikki í Føroyum ella uttanfyri Føroyar inna virksemi ella gerðir, ið hava til endamáls at fremja tílíkt virksemi, sum nevnt undir nr. 1-3:

1) Innflutningur til Føroya av vørum við uppruna í Serbia og Montenegro.
2) Útflutningur ella umskiping av vørum frá Serbia og Montenegro, semja um rættargerðir viðvíkjandi slíkum vørum og flutningur av teimum.
3) Søla og flutningur ella onnur veiting til Serbia og Montenegro til persónar ella virkir í Serbia og Montenegro, ella virkir, ið verða rikin úr Serbia og Montenegro við vørum uttan mun til upprunaland.

*lagtingslov om forbud mod handel m.v. med Serbien og Montenegro ("Forbundsrepublikken Jugoslavien").*

**§ 1.**

Virksomhed, som nævnt under nr. 1-3 eller handlinger, der har til formål at fremme sådan virksomhed, må ikke udøves på Færøerne eller uden for Færøerne af danske statsborgere, bosiddende på Færøerne eller med fly eller med skib, indregistreret på Færøerne eller chartret af danske statsborgere eller selskaber:

I) Indførsel til Færøerne af varer med oprindelse i Serbien og Montenegro.
2) Udførsel eller omladning af varer fra Serbien og Montenegro, indgåelse af retshandler vedrørende sådanne varer samt transport heraf.
3) Salg og transport til eller anden forsyning af Serbien og Montenegro, personer og virksomheder i Serbien og Montenegro, eller virksomheder, der drives fra Serbien og Montenegro med varer uanset oprindelsesland.

**Stk. 2.** Ásetingin í stk. 1 fevnir ikki um veitingar einans til lucknafrøðiliga nýtslu og ikki um mat.

**§ 2.**

Til útflutning úr Føroyum av vørum, ið koma undir § 1, stk. 1, krevst útflutningsloyvi frá landsstýrinum.

**§ 3.**

Ásetingarnar í § 1 eru ikki galdandi fyri vørur við uppruna uttan fyri Serbia og Montenegro, ið verða fluttar gjøgnum Serbia og Montenegro ella bráðfeingis eru í Serbia og Montenegro bert fyri at verða sendar víðari í samsvari við tey stevnumið, sum góðkenningarnevndin hjá Trygdarráði Sameindu Tjóða ásetir.

**§ 4.**

Endurgjaldskrøv frá myndugleikum í Serbia og Montenegro, frá løgfrøðiligum og likamligum persónum í Serbia og Montenegro ella krøv teirra vegna í samband við sáttmálar ella onnur tiltøk, hvørs fremjing ásetingarnar í hesi lóg hava forðað, kunnu ikki setast.

**§ 5.**

Persónar, herundir nevndarlimir í virkjum, ið gera brot á § 1, verða revsaðir eftir § 110 c, stk. 2 í borgarligu revsilógini, við bót, hefti ella undir herðandi umstøðum við fongsli í upp til 4 ár.

**Stk. 2.** Er brotið á § 1, stk. 1, framt av einum partafelagi, lutafelagi, smá-

**Stk. 2.** Bestemmelsen i stk. 1 omfatter ikke leverancer udelukkende til medicinsk brug samt levnedsmidler.

**§ 2.**

Udførsel fra Færøerne af varer, som er omfattet af § 1, stk. 1, kræver udførselstilladelse, der udstedes af landsstyret.

**§ 3.**

Bestemmelserne i § 1 finder ikke anvendelse for varer med oprindelse uden for Serbien og Montenegro, som transporteres i transit igennem Serbien og Montenegro, eller midlertidigt befinder sig i Serbien og Montenegro, alene med henblik på transit i overensstemmelse med de retningslinier, som fastsættes af FN's Sikkerhedsråds sanktionskomité.

**§ 4.**

Erstatningskrav fra myndigheder i Serbien og Montenegro, fra juridiske og fysiske personer i Serbien og Montenegro eller krav på deres vegne i forbindelse med kontrakter eller andre transaktioner, hvis gennemgørelse er blevet hindret på grund af bestemmelserne i denne lov, vil ikke kunne rejses.

**§ 5.**

Personer, herunder bestyrelsesmedlemmer i virksomheder, der overtræder § 1, straffes efter § 110 c, stk. 2, i borgerlig straffelov med bøde, hæfte eller under skærpende omstændigheder med fængsel indtil 4 år.

**Stk. 2.** Er overtrædelser af § 1, stk. 1, begået af et aktieselskab, andelssel-

partafelagi ella líknandi, kann verða álagt felagnum sum so bót.

skab, anpartsselskab eller lignende, kan der pålægges selskabet som sådant bødeansvar.

**§ 6.**

Hald skal leggjast á vinning frá gerðum, ið eru revsiverdar sambært § 1. § 75, stk. 1, 2. pkt., § 76, stk. 1 og stk. 3-5 og § 77, stk. 1 og 3, eru eisini galdandi viðvíkjandi inndrátti eftir hesi áseting.

**§ 6.**

Udbyttet ved handlinger, der er strafbare efter § 1, skal konfiskeres. Straffelovens § 75, stk. 1, 2. pkt., § 76, stk. 1 og stk. 3-5 og § 77, stk. 1 og 3, finder tilsvarende anvendelse på konfiskation efter denne bestemmelse.

**§ 7.**

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**§ 7.**

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

**Viðmerkingar:**

Landsstýrið hevur frá Ríkisumboðnum fingið skriv dagfest 5. januar 1993 um at seta í gildi løgtingslóg um forboð móti handli við Serbia og Montenegro ("Sambandstjóðveldið Jugoslavia").

Samstundis verður lagt fyri tingið uppskot til samtyktar um, at setast kann í gildi fyriskipan fyri Føroyar um ávís tiltøk móti Serbia og Montenegro ("Sambandstjóðveldið Jugoslavia").

Bæði lógin og fyriskipanin eru ein fylgja av resolutión nr. 757 frá 30. mai 1992 og resolutión nr. 760 frá 18. juni 1992 hjá Trygdarráði Sameindu Tjóða.

Landsstýrið mælir løgtinginum til at samtykkja lóg um forboð móti handli við Serbia og Montenegro ("Sambandstjóðveldið Jugoslavia").

# 109. Havbit og loyvi til veiðu við gørnum eftir laksi á firðum og sundum við bátum undir 20 br. reg. tons í august og september

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at gera reglur fyri at sleppa fiski út á havbit og geva loyvi til veiðu við gørnum eftir laksi á firðum og sundum til eitt avmarkað tal av bátum undir 20 br. reg. tons í august og september.

**Viðmerkingar:**

Í grannalondum okkara verður nógv gjørt við at sleppa fiskayngli út á havbit. Stjórnin í Noregi samtykti eftir tilmæli frá Stórtinginum í 1990 at fara undir havbitsætlanina PUSH (Program for Utvikling og Stimulering av Havbeiti). Bara í 1992 vórðu játtaðar 34 mió. kr. til PUSH-ætlanina.

Roynt verður við laksi, rækjum, toski og hummara, ið verða slept út á havbit. 400.000 av toskayngli vórðu slept út í 1991, 340.000 laksasmolt í 1992, og 60.000 hummaraungar verða hvørt ár settir út í Suður-Noregi. PUSH-ætlanin gongur til 1997/98.

Tað hevur eisini verið roynt í Føroyum at slept laksasmolt út á havbit, men hesar royndir linkaðu og steðgaðu heilt upp eftir útsetingina í 1990.

Yvirlit yvir laksasmolt, sum higartil hevur verið slept á havbit í Føroyum, er hetta:

1985: 40.000 stk.
1986: 60.000 "
1987: 27.000 "
1988: 65.000 " (slept í Fámjin ),
1989: 25.000 " ( " "Leynum),
1990: 15.000 " ( " " " ),

Sjálvt um eingi nágreinilig tøl eru til taks. verður mett, at 10% koma aftur av tí føroyska laksinum, sum út verður sleptur. Tað er meira enn í Noregi. Men føroyski laksurin tykist ikki vaksa eins væl og tann norski. Norski laksurin er eftir 1 ár vorðin 2,4 kg, hin føroyski bara 1,7 kg.

Laksurin, ið sleptur verður út á havbit, heldur til norðanfyri Føroyar, har tann heiti og kaldi sjógvurin møtast. Har er umframt hin føroyska bæði norskur, svenskur, íslendskur og bretskur laksur. 25% av veiðuni hjá línuskipinum "Hvítakletti", sum fyri Fiskirannsóknarstovuna royndarfiskar eftir laksi norðanfyri, sigst vera laksur, sum er komin úr Føroyum, annaðhvørt sleptur ella sloppin úr alibrúkunum á sjónum.

Hesin laksur leitar aftur henda veg, tá ið hann verður gýtingarførur, fyri at sleppa upp í áirnar, og kann veiða eftir honum gerast eitt gott ískoyti hjá útróðrarmonnum.

Hóskandi kann tá eitt laksagjald verða ásett, sum tað varð fyri skipini, ið veiddu laks norðanfyri uppá 1 kr. fyri hvørt kg., ið fór í ein laksagrunn at fíggja útseting v.m.

Størsta laksaveiðutjóð í heiminum er Alaska, sum USA keypti frá Ruslandi í 1867 fyri 7 mió. dollars, har vórðu veidd í 1991 330 tús. tons av laksi. Meiri enn triðingurin av hesari veiðu stavar frá havbiti. Hitt er villur laksur, ið veiddur verður.

Í Alaska verður meira smolt framleitt enn nakra aðrastaðni. Alt verður slept út á havbit. Tí aling av laksi (matfiski) er bannað í Alaska. Ilreilar 1,3 miljardir av smolti vórðu sleptar út har í 1991.

## Álit

### í

*løgtingsmáli nr. 109/1992: Havbit og loyvi til veiðu við gørnum eftir laksi á firðum og sundum við bátum undir 20 br. reg. tons í august og september.*

Málið er lagt fram av Kristiliga fólkaflokkinum, Førya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 9. mars 1993 og eftir 1. viðgerð 18. mars 1993 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Heini O. Heinesen, Jógvan A. Johannessen, Sommer Winther og Asbjørn Joensen) vísir á, at treytin fyri at seta smolt út á havbit er, at fiskurin er frískur. Havandi í huga, at neyðugt er at skerja verandi fíggjarlóg við 65 mió. kr., dugir meirilutin ikki at síggja, at tað í løtuni er møguleiki at fíggja eina útseting

av smolti á havbit. Annars vísir meirilutin á, at sambært løgtingslóg nr. 8 frá 29. mars 1978 um fiskiveiðu á landleiðini, hevur landsstýrið saman við fiskivinnunevndini heimild at gera slíkar reglur, sum uppskotstillarin mælir til. Meirilutin tekur tí ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Jógvan 1. Olsen og Leivur í Buð) vísir á, at her eru møguleikar at skapa nøkur nýggj arbeiðspláss og tekur minnilutin undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja fyriliggjandi uppskot.

Minnilutin (John Petersen) tekur støðu í tingsalinum.

# 110. Fyriskipan um ávís tiltøk móti Serbia og Montenegro ("Sambandstjóðveldið Jugoslavia")

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið samtykkir, at setast kann í gildi fyri Føroyar fyriskipan um ávís tiltøk móti Serbia og Montenegro ("Sambandstjóðveldið Jugoslavia").

**Viðmerkingar:**

Landsstýrið hevur frá ríkisumboðnum fingið uppskot til fyriskipan fyri Føroyar um ávís tiltøk móti Serbia og Montenegro.

Fyriskipanin er ein fylgja av resolutión nr. 757 frá 30. mai 1992 og resolutión nr. 760 frá 18. juni 1992 hjá Trygdarráði Sameindu Tjóða.

Samstundis verður lagt fyri løgtingið uppskot til løgtingslóg um forboð móti handli við Serbia og Montenegro.

Orsøkin til, at talan er bæði um at seta í gildi fyriskipan fyri Føroyar og at seta í gildi løgtingslóg, er at handil er yvirtikin sum scrmál, meðan uttanríkismál eru felagsmál.

Í Danmark eru tiltøkini sett í gildi við fyriskipan nr. 413 frá 2. juni 1992 um ávís tiltøk móti Serbia og Montenegro ("Sambandstjóðveldið Jugoslavia") og við fyriskipan nr. 800 frá 25. september 1992 um broyting í fyriskipan um ávís tiltøk móti Serbia og Montenegro ("Sambandstjóðveldið Jugoslavia").

Hjálagt er uppskot til fyriskipan fyri Føroyar um ávís tiltøk móti Serbia og Montenegro (Sambandstjóðveldið Jugoslavia), skriv dagfest 17. desember 1992 frá uttanríkismálaráðnum til forsætismálaráðið, pressuskriv uttanríkismálaráðsins nr. 132/92 og skriv ríkisumboðsins, dagfest 5. januar 1993.

Landsstýrið mælir løgtinginum til at samtykkja, at fyriskipanin kann setast í gildi fyri Føroyar.

# 111. Avtøka av punktgjaldi fyri "spariperur" (lágorkuperur)

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum beinanvegin at fáa avtikið punktgjaldið (30%) á lágorkuperum í samljóð við løgtingssamtyktina frá 6. februar 1992.

**Viðmerkingar:**

Løgtingið samtykti hin 6. februar 1992 við atkvøðunum 26-0 eftir uppskoti frá Kristiliga fólkaflokkinum Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki at áleggja landsstýrinum at gera kanningar um lágorkuperurnar og leggja fram uppskot um broytingar í galdandi tolllóg, um úrslitið talar fyri tí.

Síðan er meirvirðisgjald (23%) lagt á allar vørur og tænastur, og fyri ravmagnsperur verður harumframt goldið eitt punktgjald upp á 30%.

Í grannalondum okkara, t.d. Danmark, sleppa lágorkuperurnar, tær sokallaðu "spariperurnar", undan tolli, tí at tær lætta so nógv um ljósútreiðslurnar bæði hjá tí einstaka húsarhaldinum, virkjum og tí almenna.

Ein tílík pera av góðkendum slagi kostar har 120 kr., meðan hon í Føroyum fæst fyri 170 kr.

Um punktgjaldið upp á 30% varð avtikið, sum tað er fyri so nógvar aðrar vørur her, hevði prísurin í Føroyum verið á leið hin sami sum í Danmark.

Marknaðarkanningar vísa, at prísurin skal niður í móti 100 kr. fyri hvørja peru, áðrenn fólka fara at keypa og brúka tær.

Sparingarnar eru stórar, tá ið lágorkuperur verða nýttar heldur enn gløðiperur.

Ein lágorkupera uppá 11 W svarar í ljósstyrki til eina gløðiperu uppá 60 W. Livitíðin er 8000 tímar, meðan gløðiperan brennur í 1000 tímar.

Lágorkuperan gevur eina rættiliga stóra sparing í orkunýtsluni, sum tað sæst á niðanfyristandandi roknistykki:

| **Slag** | **gløðipera 60 W** | **Lágorkupera 11 W** |
|---|---|---|
| Livitíð | 1000 tímar | 8000 tímar |
| Orkunýtsla pr. 8000 tímar | 480 kW | 88 kW |
| rokning privatbrúkari | 820 kr. | 150 kr. |
| rokning virki/handil | 667 kr. | 122 kr. |

**Dømi:**
Ein skúli, sum hevur 50 perur brennandi 8 tímar um dagin, 5 dagar um vikuna, kundi soleiðis spart í streymnýtslu (roknað fyri 40 vikur):

| | |
|---|---|
| 50 x 8 tímar x 5 x 40 x (60W x 1,39) + 23% = | 8.207 kr. |
| 50 x 8 tímar x 5 x 40 x (11W x 1,39) + 23% = | 1.504 kr. |
| Spart verður í elektriciteti | 6.703 kr. |

Sama er galdandi fyri barnagarðar, vøggustovur, flakavirkir, bankar og allar aðrar brúkarar í landinum. Henda sparingin er í krónum fyri brúkaran, men fyri føroyska samfelagið merkist sparingin sum minni innflutingur av olju til el-framleiðslu. Harafturat kemur, at SEV fær minni brúk fyri at keypa nýggjar motorar, tá teir gomlu eru útslitnir, um nýtslan av lágorkuperum verðu økt í mun til gløðiperuna.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 111/1992: Avtøka av punktgjaldi fyri "spariperur" ("lágorkuperur").*

Málið er lagt fram av Kristiliga fólkaflokkinum, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 9. mars 1993 og eftir 1. viðgerð 31. mars 1993 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jacob Lindenskov, Jørgen Niclasen og Óli Breckmann) tekur ikki undir við málinum og setir eingi uppskot fram.

Minnilutin (Finnbogi Arge og Lasse Klein) tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskotið.

# 112. Avtøka av útvarps- og sjónvarpsmonopolinum

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum sum skjótast, at taka neyðug stig til, at einkarrætturin verður tikin frá Útvarpi- og Sjónvarpi Føroya, og at ein demokratiscring verður framd innan hetta fjølmiðlaøkið.

**Viðmerkingar:**

Eystanfyri eru múrar raplaðir - ein fyri og annar eftir. Heima hjá okkum tykist trupult at fáa monopolmúrarnar at rapla. Royndir hava verið gjørdar uttan nakað úrslit.

Við hesum uppskoti verður enn einaferð ein roynd gjørd.

Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya eru helst komin fyri at verða, men skipanin um einkarrætt eigur at verða niðurløgd.

Í grannalondum okkara síggja vit, at ein støðug demokratisering á hesum øki fer fram, og at fleiri sokallað lokal- og nærvarp eru farin at virka.

Í Føroyum eru bæði felagsskapir og persónar reiðir fyri slíkum virksemi, men má ásannast, at útvarpsmonopolið við sínum lógarfesta einkarrætti, beinleiðis er ein forðing fyri nakrari menning á hesum øki.

Í apríl mánaði 1991 reisti undirritaði fyrispurning á tingi viðvíkjandi nærvarpi í Føroyum.

Í svari frá Maritu Petersen, landsstýriskvinnu, varð m.a. sagt, at landsstýrið arbeiddi miðvíst við spurninginum, og at nevnd sat og arbeiddi við málinum. Víðari varð upplýst, at "allar umsóknir frá áhugaðum fyri nærvarpi ganga inn í arbeiðstilfarið hjá nevndini. Nevndin arbeiðir seriøst við spurninginum um demokratisering á fjølmiðlaøkinum - og er medvitandi um tann týdning, pressufrælsið hevur í einum demokratiskum samfelag."

Loksins varð sagt frá, at nevndararbeiðið skuldi verða liðugt á sumri 91, og kundi tá støða takast til eitt nú spurningin um nærvarp.

Eftir drúgt og gott arbeiðið legði nevndin álit úr hondum í juni 1991. Viðvíkjandi spurninginum um nærvarp sæst í álitinum, at nevndin er samd um, at tað skal verða loyvt at senda nærútvarp og nærsjónvarp - og gevur hon hetta tilmælið við teirri grundgeving, at hetta fer at styrkja talufrælsið og við hesum eisini fólkaræðið.

Nevndin mælir annars til, at byrjað verður við eini 2 ára royndartíð, og at nærvarpingin eigur at verða skipað soleiðis, at sent kann verða á egnum sendineti til eitt geografiskt avmarkað øki (økisnærvarp). Harumframt eigur tað eisini at verða skipað so fyri, at tað skal verða møguligt at keypa avlopstíð á verandi sendinetum, sum ÚF og SVF brúka í dag, fyri kostprís (áhugavarp).

Nú tað nærkast tveimum árum. síðan nevndin handaði landsstýrinum álitið, átti landsstýrið nú at verið komið til eina niðurstøðu og fingið arbeiðið frá hondini.

Tí verður enn einaferð skundað undir.

## Álit

### í

*løgtingstingmáli nr. 112/192: Avtøka av sjónvarpsmonopolinum.*

Málið varð lagt fram av Tordi J. Niclasen tann 9. mars og eftir 1. viðgerð tann 30. mars 1993 beint í mentunar- og skúlanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Hergeir Nielsen, Jógvan Adolf Johannessen og Helena Dam á Neystabø) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Jógvan Sundstein og Agnar Nielsen) tekur undir við uppskotinum, og mælir til at samtykkja tað.

# 113. Frið at royna eftir hvítingi við línu

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum saman við fiskivinnunevndini at tryggja veiðimøguleikarnar hjá bátum, ið royna við línum eftir hvítingi frá 15. mai til 15. august norðanfyri og eystanfyri.

**Viðmerkingar:**

Trolingin á landleiðini er tey seinastu árini øll endað norðanfyri og eystanfyri á leiðunum hjá teimum bátunum, sum um sumrarnar royna eftir hvítingi.

Hetta man vera ein av orsøkunum til, at veiðan eftir hvítingi er ov nógv minkað. Veiðitølini eru hesi smb. Hagstovuni fyri landingar í Føroyum:

**1989:** 1149 tons
**1990:** 1168 "
**1991:** 988 "
**1992:** 520 "

Hvítingur kemur inn eystanfyri og gýtir eysturi í Holinum. Línubátarnir plaga at fáa væl av honum frá hálvum mai til hálvan august.

Nú fiskaloysi er, og standurin ikki góður, seta menn álit sítt á hvítingin, sum góður prísur hevur fingist fyri. Útróðrarmenn stúra tó fyri, at fiskiskapurin eftir hvítingi aftur í ár fer at verða órógvaður av trolingini á landleiðini, tí at hvítingur er styggur fiskur, ið fer undan trolinum og ringur at fáast við, tá ið hann verður órógvaður.

Útróðrarfeløgini norðanfyri hava tí heitt á landsstýrið og fiskivinnunevnd løgtingsins um at friða leiðirnar fyri trol rættvísandi norðan úr Ennibergi til landsyning eystan úr Skorini út á 12 fjórðingar frá 15. mai til 15. august.

# Álit

í

*løgtingsmáli nr. 113/1992: Frið at royna eftir hvítingi við lbnu.*

Málið er lagt fram av Niels Paula Danielsen, løgtingsmanni, tann 9. mars 1993 og eftir 1. viðgerð 18. mars 1993 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Henrik Old, Jógvan A. Johannessen, Anfinn Kallsberg og Olaf Olsen) vísir á, at talið av bátum sum hava loyvi at trola innanfyri 12 fjórðingar er minkað nógv seinastu árini. Í 1992 varð samtykt lóg, har 6 trolbátar, sum høvdu trolloyvi í 1991, kundu fáa stuðul í samband við umlegging til aðra veiðu, treytað av, at hesir ikki taka lut í troling innanfyri 12 fjórðingar. (Løgtingsmál nr. 165/1991: Løgtingslóg um umleggingarstuðul til trolbátar). Leiðirnar, sum trolbátarnir hava loyvi at fiska á, eru lagdar soleiðis, at pláss er eisini fyri bátum, sum royna eftir hvítingi. Hetta er gjørt partvís í samráð við útróðrarmenn. Eisini vísir meirilutin á § 4 í løgtingslóg nr. 8 frá 29. mars 1978 um fiskiveiðu á landleiðini, ið er soljóðandi: "At skipa fyri fiskiskapinum við fiskiførum, sum hava heimstað og eru skrásett í kongaríkinum, er landsstýrinum eftir samráð við løgtingsins fiskivinnunevnd heimilað við kunngerð at áseta reglur um, hvussu fiskiskapur skal fremjast á landleiðini, tað er reglur um minstamát, friðað øki, friðingartíðir, fiskireiðskap og nýtslu teirra, fiskiháttur, avmarking av veiðunøgd, avmarking av veiðuorku, aling og flyting av yngli og onnur tílík tiltøk". Út frá hesum tekur meirilutin ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Jógvan Ingvard Olsen og Terje Davidsen) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Heini O. Heinesen) tekur í prinsippinum undir við málinum, men tá ið uppskotsstillarin ikki hevur sín egna flokk aftanfyri seg í málinum, kann minnilutin ikki binda Tjóðveldisflokkin í hesum máli. Minnilutin (Heini O. Heinesen) tekur annars støðu í tingsalinum.

# 114. Ígildissetan fyri Føroyar av samarbeiðssáttmálanum fyri Norðurlandaráðið

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið samtykkir, at sáttmáli, dagfestur 21. august 1991, um broyting í samstarvsavtaluni við Finland, Ísland, Noreg og Svøriki verður kunngjørdur í Føroyum.

**Viðmerkingar:**

Ríkisumboðið hevur heitt á landsstýrið um at taka undir við, at nevndi sáttmáli verður settur í gildi fyri Føroyar.

21. august 1991 undirskrivaðu norrønu samstarvsráðharrarnir semju um broytingar í norrøna samstarvssáttmálanum frá 23. mars 1962, tann sonevndi Helsingforssáttmálin.

Broytingarnar fevna um greinirnar 51, 52 og 54- 58 í sáttmálanum og snúgva seg um arbeiðsreglur og arbeiðsgongd í norrøna samstarvinum.

Nevnast kann, at broytingarnar viðføra m.a., at meira enn ein árlig session kann verða hildin, at forsetin fyri ráðið og nevndir ráðsins kunnu seta fram uppskot og at limir fáa rætt til at seta fram skrivligar spurningar til ráðharraráðið og stjórnirnar millum sessiónirnar.

Viðmerkjast kann, at Føroyar hava havt umboð í nevndini, sum hevur gjørt broytingarnar, og hava tær ongar avleiðingar fyri føroysku luttøkuna í norðurlanda samstarvinum.

# 115. Lækking av kostnaðinum á heilivági

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at taka neyðug stig til, at kostnaðurin á heilivági lækkar.

**Viðmerkingar:**

Tá lógin um MVG-gjald varð samtykt, avgjørdi saungongumeirilutin samstundis, at fólkið, ið her búleikast, skuldi gjalda meiri fyri heilivágin - oman á so mangt annað.

31. august 1993 legði undirritaði uppskot á ting, har skotið varð upp at gera broytingar í lógini um meirvirðisgjald, soleiðis at m.a. heilivágur varð undantikin meirvirðisgjaldi.

Uppskotið fekk tíverri ikki undirtøku og fall.

Undir viðgerðini førdu landsstýrismenn fram, at ikki var neyðugt at frítaka heilivág fyri MVG, tí tað væl bar til at lækka prísin á heilivági á annan hátt.

Tey sum hava heilivág fyri neyðini hava av sonnum kent avleiðingarnar av, at landsstýrið hækkaði prísirnar á heilivági við heilum 23%. Her er talan um 23%, sum verða løgd oman á útsøluprísin í staðin fyri tey 6% sum vórðu á innflutingsgjaldi.

Henda hækking hevur rakt meint og kennist sum steinur oman á byrðu hjá mongum húski og einstaklingum kring landið.

Ein ikki óhugsandi avleiðing kann verða, at fólk fara at himpra seg við at keypa tann av læknunum fyriskipaða heilivágin.

Harmiligt, at landsstýrið ikki royndir at seta seg inn í støðu teirra, sum hava heilivág fyri neyðini og sum í hesum døgum, orsakað av øðrum tiltøkum landsstýrisins hava seta trupult við at fáa endarnar at røkka.

Onnur avleiðing er, at viðgerðarstovnar (sjúkrahús, røktarheim v.m.) koma í ólukku mát at merkja príshækkingarnar á heilivági. Hetta er sera óheppið, har raksturin er skorin at beini, at fáa eina so stóra cykaútreiðslu, ið dýrkanin av heilivági hevur við sær.

Pensionistarnir og tey sjúku eru tey, sum komu at kenna sviðan dyggast, tá landsstýrið valdi at prioritera útleigan av rúmum til úlendsk ferðafólk og bøkur hægri enn heilivág í at verða undantikið MVG.

**Álit**

**í**

*løgtingsmáli nr. 115/1992: Lækking av kostnaðinum á heilivági.*

Málið er lagt fram av Tordi J. Niclasen tann 16. mars 1993 og eftir 1. viðgerð tann 24. mars 1993 beint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í eina meiriluta og eina minniluta.

Meirilutin (Asbjørn Joensen, Jacob Lindenskov og Heini O. Heinesen) vísir til álitið í løgtingsmáli nr. 141/1992 og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Óli Breckmann og Lisbeth L. Petersen) tekur undir við uppskotinum.

# 116. Viðvíkjandi broytingum í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya í sermálum

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at gera uppskot til broytingar í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya í sermálum og sum skjótast at leggja málið fyri tingið.

**Viðmerkingar:**

Tey seinru árini í politisku søgu landsins hava verið merkt av rembingum, skuldsetingunum um heimildarloysi landsstýrismanna og hevur ein gølan fyri og onnur eftir merkt orðaskiftið.

Í samband við málið um Heygadrang kyknaði kjakið aftur um leiklut politikaranna, og hvar tann politiska ábyrgdin í veruleikanum lá.

Sambært løgtingslóg um stýrisskipan Føroya í sermálum er tað landsstýrið, sum stendur til svars fyri umsitingini av sermálum. Her er talan um eina kollegiala ábyrgd.

Trupulleikin við føroysku stýrisskipaini er sostatt tann, at tað als ikki ber til at plasera ábyrgd hjá einstøkum landsstýrismonnum.

Henda "ábyrgdarleysa" skipan hevur ikki gagnað fyrisitingini ella politiska umdømi Føroya - hvørki heima ella uttanlands.

Vit áttu tí sum skjótast at gingið burtur frá hesi "kollegialu skipan", har allir (ella ongin) hevur ábyrgd av tí ið ein fremur, og heldur fingið eina sokallaða ministerialskipan, har einstaki landsstýrismaðurin einsamallur hevur ábyrgd av sínum málsøki.

Ein annar vansi í okkara stýrisskipan er samanblandingin av útinnandi og lóggevandi valdinum.

Her verður hugsað um, hvussu tær stóru nevndirnar - einamest fíggjar- og fiskivinnunevndin eru við í beinleiðis umsitingini av samfelagnum. Tað átti at kunna latið seg gjørt, at umsitingarvaldið - landsstýrið - umsat eftir lógum og reglum, uttan at tær ymisku nevndirnar beinleiðis løgdu seg út í umsitingina.

Broyting á hesum øki hevði somuleiðis gjørt tað lættari at plasera ábyrgd.

Lond við fólkaræðisligari stýrisskipan hava skipað almenna valdið í tríggjar sínamillum óheftar partar: lóggevandi, útinnandi og dømandi valdið.

Slík skipan er ikki av tilvild, men fyri at tryggja borgarunum grundleggjandi fólkaræðislig rættindi.

Hvat eftirlit við útinnandi umsitingini viðvíkur, hevði tað tænt borgarans sak, at havt ein løgtingsins umboðsmann.

Einki at ivast í, at ein ministerialskipan, og har greiður skilnaður varð millum lóggevandi og umsitingarvaldið, hevði gjørt, at skattgjaldarans peningur hevði verðið umsitin við størri ábyrgd enn higartil.

Hetta skylda vit skattgjaldaranum og hetta skylda vit okkum sum tjóð.

Við atliti at hesum viðmerkingum er tað, at heitt verður á landsstýrið, um at gera broytingar í lógini um Stýrisskipan Føroya í sermálum.

Nú kann ikki bíðast longur at fáa hesi viðurskifti í rættlag, um vit framvegis skulu kunna tosa um eitt rættarsamfelag, sum vit siga Føroyar vera.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 116/1992: Viðvíkjandi broytingum í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya í sermálum.*

Málið er lagt fram av Tordi J. Niclasen, løgtingsmanni tann 16. mars 1993 og eftir 1. viðgerð 25. mars 1993 beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin vísir á, at landsstýrið hevur sett nevnd at koma við uppskoti um broytingar í stýrisskipannarlógini.

Meirilutin (Mikkjal Sørensen, Hergeir Nielsen, Helena Dam á Neystabø og Birgir Danielsen) tekur ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

Ein minniluti (Lisbeth L. Petersen) hevur hesar viðmerkingar:

Hin 13. mai 1948 var lóg um stýrisskipan Føroya í sermálum sett í gildi. Burtursæð frá smærri dagføringum í 1975 og 1985 er henda lóg at kalla enn óbroytt.

Minnilutin vísir á, at landsstýrið í apríl 1991 legði fram uppskot til løgtingslóg um ábyrgd landsstýrismanna, og var hetta uppskotið seinni til viðgerðar í rættarnevndini.

Álitið frá nevndini var lagt fram tann 3. juni 1992 og Sambandsflokkurin hevði í álitinum broytingaruppskot til lógaruppskotið, eins og skotið varð upp samsvarandi hesum at fremja broyting í § 26 í stýrisskipanarlógini, so møguleiki var at gera kanningar, og um neyðugt at reisa ákæru móti landsstýrismanni, um ivi var um viðurskifti hansara, tá landsstýrið ella í minsta lagi 2/5 av limum løgtingsins gjørdu hetta av.

Hetta broytingaruppskot varð ikki samtykt á løgtingi, og lógin um ábyrgd landsstýrismanna hevur tí ikki tann týdning ella virði, sum slík lóg eigur at hava, skal nøkur meining vera við henni.

Sitandi landsstýrissamgonga hevur boðað frá nýggjari sjálvstýrislóg og í tí sambandi eisini broyttari stýrisskipannarlóg.

Sambandflokkurin tekur ikki undir við ætlanum landsstýrisins um eina sjálvstýrislóg og heldur ikki eini broyttari stýrisskipannarlóg, ið hellir á tann bógvin, sum hetta landsstýrið ynskir.

Uppskotið til samtyktar, sum nú fyriliggur, áleggur sitandi landsstýri at gera uppskot til broytingar í stýrisskipannarlógini sum skjótast.

Sambandsflokkurin ásannar, at lógin krevur eina dagføring, og vísandi m.a. til broytingaruppskot floksins í sambandi við løgtingslóg um ábyrgd landsstýrismanna, fer flokkurin at leggja uppskot um dagføring av lógini fyri løgtingið í næstum.

Minnilutin (Lisbeth L. Petersen) tekur tí ikki, sum er, undir við fyriliggjandi uppskoti.

# 117. Menning av jarðarbrúkinum

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

**I.** Heitt verður á landsstýrið at seta nevnd at kanna og koma við tilmæli um, í hvønn mun jarðarbrúkið her á landi kann mennast.

**II.** Heitt verður á landsstýrið at taka neyðug stig til, at mjólkaprísirnir koma á eitt støði, sum ið hvussu so er kemur barnafamiljum til góða.

**Viðmerkingar:**

Í Føroyum er rávøra, sum liggur so gott sum ónýtt - ódyrkaða jørðin.

Dyrkað, vildi hon skapt arbeiði til nógvar hendur - beinleiðis hjá bøndrum og óbeinleiðis í vinnu, sum harav stendst, (sláturvirki - søla - útflutningur - fóðurframleiðsla v.m.) Í hesum døgum har støðugt vaksandi arbeiðsloysi ger seg galdandi, vildi henda vinna í nógv størri mun skapt fortreytir hjá mangari familju fyri lønandi virksemið.

Hvat neyðugum amboðum (maskinum) viðvíkur, so má havast í huga, at runt í landinum standa óivað mangar maskinur, ið eru klárar/tøkar til nýtslu, og vælegnaðar at dyrka við.

Víst hevur verið á, at føroyingar drekka væl minni mjólk enn t.d. íslendingar, og at tað tí helst er ein "krógvaður" marknaður fyri øktari mjólkaframleiðslu her á landi.

Eisini áttu fortreytir at verið skaptar fyri útflutningi av mjólk, eins væl og øðrum landbúnaðarvørum. Ikki minst, um vit í søluarbeiðinum dugdu at gera nýtslu av, at her er talan um vøru, sum kemur úr reinasta umhvørvinum í Europa. Sekunderi ídnaðurin, (pakningsframl. virki) vildi fingið stóran ágóða av hesi útflutningsvinnu.

Í løtuni eru mjólkaprísir okkara millum teir hægstu, sammett við grannatjóðir okkara.

Við heilsufremjan í huga, eru politiskar røddir frammi í Noregi at fáa mjólkina enn bíligari.

Í Noregi er skipan, har barnafamiljur hava møguleika fyri at fáa mjólkina bíligari til keyps.

Íslendingar drekka uml. 100 litrar meir av mjólk árliga pr. íbúgva enn føroyingar.

Tann dýra mjólkin elvir til, at føroyingar - og serliga barnarikar familjur, í hesum krepputíðum - freistast til, heldur enn at keypa heilsufremjandi mjólk, at keypa saft, vánaligt juice - og ikki at gloyma sodavatnið, sum í hesum døgum "fossar" inn á okkum uttaneftir.

Hesir leskidrykkir fáast fyri umi 50% av tí, sum mjólkin kostar.

Skotið verður tí upp, at tiltøk verða gjørd, fyri at fáa mjólkaprísin á eina legu, so foreldur, serliga í hesum krepputíðum, hava ráð at keypa børnunum heilsugevandi mjólk heldur enn bíligar eftirgerðir.

Í hesum døgum verður kvota løgd á framleiðsluna av mjólk. Ístaðin átti tiltøk at verið sett í verk, sum førdu við sær, at føroyingurin aftur hevði ráð at drekka mjólk.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 117/1992: Menning av jarðarbrúkinum.*

Málið er lagt fram av Tordi J. Niclasen, løgtingsmanni, tann 16. mars 1993 og eftir 1. viðgerð 1. apríl 1993 beint í landbúnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Mikkjal Sørensen, Heini O. Heinesen, Asbjørn Joensen og Birgir Danielsen) vísir á, at uppskotið til samtyktar er í tveimum. Viðvíkjandi fyrra partinum av uppskotinum er meirilutin av teirri áskoðan, at tað er áhugavert at vita, hvat Jarðarráðið, hvørs limir løgtingið og landsstýrið velur, heldur um menningarmøguleikarnar av jarðarbrúkinum, og tí tekur meirilutin ikki undir við hesum partinum av uppskotinum.

Meirilutin heldur, at ikki er rætt at mjólk verður stoytt burtur, heldur enn at koma brúkaranum til góða. Meirilutin metir tað ynskiligt, at meir mjólk verður seld, og vónar, at teir sum hava ábyrgd av hesum, gera alt sum er møguligt fyri at økja um nýtsluna. Tíðin at viðgera málið hevur verið ov stutt og setir meirilutin tí einki uppskot fram.

Minnilutin (Terje Davidsen) tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskotið.

# 118. Heilivágur til alivinnuna

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at tryggja alivinnuni so bíligan heilivág sum gjørligt.

**Viðmerkingar:**

Alivinnan hevur tað trupult fíggjarliga og kemur hetta einamest til sjóndar í manglandi likviditeti, sum í veruleikanum avspeglar búskaparligu kreppuna í samfelagnum.

Vinnan hevur verið fyri einum bakkasti fyri og øðrum eftir.

Ein tyngjandi trupulleiki hjá hesi vinnu hevur verið ymisk sjúkufyribrigdi, har tørvurin og nýtslan av heilivági hevur tyngt munandi um raksturin.

Hvat heilivági til alivinnuna viðvíkur, er tað soleiðis, at alarar hava kunnað víst á, at prísurin er munandi hægri, tá keypt verður frá apoteki, í mun til hvat henda vøra hevði kostað, um teir sjálvir fluttu hana beinleiðis inn í landið.

Dømi kann nevnast um ávíst slag av heilivági, har tað frá apoteki kostaði kr. 10,70 pr. litur, meðan prísurin við beinleiðis innflutningi til brúkaran kostaði 8,11 kr. pr. litur.

Sambært § 32 í løgtingslóg um apoteksverkið og heilivág er tað "bert Apoteksverkið, ið hevur loyvi til at framleiða, flyta inn, flýggja út, hava á goymslu, handla við og pakka heilivág..."

Endamálið við hesi grein varð at tryggja brúkaran soleiðis, at serkunnleiki altíð kundi tryggja at vøran var tann rætta til tað og tað endamálið.

Henda skipan kann tykjast skilagóð, men eigur undir ongum umstøðum at loyva teim sum flyta inn og selja at "skúma fløtan" og gera tað tyngri hjá teim, sum undir vána umstøðum royna at hava alivinnuna gangandi.

Í § 30, 2. stk. í løgtingslóg um Apoteksverkið og heilivág hevur landsstýrið heimild at taka avgerð um, hvørjar vørur kunnu verða tiknar undan lógini, og at seta reglur um slíka undantøku.

Um annað ikki hjálpir til tess at fáa alivinnuni bíligari heilivág til vega, so eigur landsstýrið at gera nýtslu av nevndu heimild.

Tað er heilt órímiligt, at henda útflutningsvinna skal verða tyngd óneyðugt av slíkum gjøldum.

Vælvitandi, at hetta ikki loysir trupulleikarnar, alivinnan er í, má tó ásannast, at allur bati bøtur.

**Álit**

**í**

*løgtingsmáli nr. 118/1992: Heilivágur til alivinnuna.*

Málið er lagt fram av Tordur J. Niclasen, løgtingsmanni, tann 16. mars 1993 og eftir 1. viðgerð 31. mars 1993 beint í fdnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og tekur ikki undir við uppskotinum. Í staðin setir ein samd nevnd fram soljóðandi:

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Heitt verður á landsstýrið um at hava eftirlit við, at apoteksverkið ikki tekur órímuligan vinning av heilivági til alivinnuna.

# 119. Veiðuloyvi bert at galda húkaveiðu

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Tá veiðibann fyri kassa I fer úr gildi, verður bert loyvt at veiða við húki í nevnda øki.

**Viðmerkingar:**

Tíðaravmarkað veiðubann á gýtingarleiðum varð sett í verk 31. januar 1993 fyri allari veiðu millum 315 rættvísandi úr Barðinum og 360 rættvísandi úr Mýlingi frá 12 fjórðingum og úteftir. (Kassi 1).

Eftir ætlan skuldi hetta veiðibann fara úr gildi 15. mars 1993, men er avgerð nú tikin um at leingja hetta veiðibann til 1. apríl 1993. Tó soleiðis, at snellubátar sleppa at veiða upsa í hesum tíðarskeiði.

Húkaveiðan hevur teir seinastu mánaðirnar verið fyri bakkøstum og hvat heimaútróðrinum viðvíkur, er støðan hjá útróðrarmonnum og familjum teirra vorðin ótolandi, har vána veður og vána fiskiskapur hevur gjørt seg galdandi.

Sum dømi kann nevnast, at útróðrabátar norðanfyri, sum fyri fáum árum síðan fingu eini 100 - 200 pund upp á stampin, nú mangan bert hava ligið um eini 25 - 50 pund upp á stampin - og enntá minni!

Havandi hesa vána støðu útróðramanna í huga, er tað umráðandi, at bert húkaveiða verður loyvd á nevnda øki, tá kassi 1 verður opnaður aftur.

Í hesum døgum, har arbeiðsloysi er stórt, eigur at havast í huga, at húkaveiðan gevur munandi meiri arbeiði - bæði á sjógvi og landi, og at hesin veiðiháttur er gagnligari fyri stovnsrøktina.

Ikki óhugsandi er trýstið - eisini politiska trýstið - á avvarðandi myndugleika stórt í hesum døgum, og er tað tí at vóna, at landsstýrið hevur rygg til at taka avgerðir, sum upp á longri sikt eru samfelagsgagnligar.

Tí verður í hesum føri skotið upp, bert at loyva veiðu við húki á nevnda øki.

Skal útróðrinum verða lív lagað, er tað umráðandi, at slík stig nú verða tikin.

## Álit

### í

*løgtingsmáli nr. 119/1992: Veiðiloyvi bert at galda húkaveiðu.*

Málið er lagt fram av Tordi J. Niclasen, løgtingsmanni, tann 16. mars 1993 og eftir 1. viðgerð tann 30. mars 1993 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Heinrik Old, Jógvan A. Johannessen, Anfinn Kallsberg og Olaf Olsen) vísir á tær seinastu kunngerðirnar um broytingar viðvíkjandi fiskiveiðuni á landleiðini, sum eru lýstar í kunngerðarblaðnum A 1993, hefti 7. Eisini verður víst á § 4 í løgtingslóg nr. 8 frá 29. mars 1978, um fiskiveiðu á landleiðini, ið er soljóðandi: "At skipa fyri fiskiskapinum við fiskiførum, sum hava heimstað og eru skrásett í kongaríkinum, er landsstýrinum eftir samráð við løgtingsins fiskivinnunevnd heimilað við kunngerð, at áseta reglur um, hvussu fiskiskapur skal fremjast á landleiðini, tað eru reglur um minstamát, friðað øki, friðingartíðir, fiskireiðskap og nýtslu teirra, fiskihættir, avmarking av veiðunøgd, avmarking av veiðuorku, aling og flyting av yngli og onnur tílík tiltøk". Út frá hesum tekur meirilutin ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Jógvan Ingvard Olsen og Terje Davidsen) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Heini O. Heinesen) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram. Minnilutin vísir annars á tingmál nr. 149/1992: Fýra trolfrí øki á landleiðini.

# 120. Viðvíkjandi innflutningi av breyðvørum

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at taka neyðug stig til at avmarka innflutingin av breyðvørum.

**Viðmerkingar:**

Áðrenn Handilssáttmálin millum EF og Føroyar varð samtyktur, varð bæði frá politiskari og vinnuligari síðu ávarað í móti teim avleiðingunum, hesin sáttmáli kom at hava á føroyska heimaídnaðin.

Tíverri fingu hesar røddir rætt.

Eitt virki fyri og annað eftir hevur latið aftur, og júst eisini av hesi orsøk eru eisini fleiri og fleiri vorðin arbeiðsleys.

MVG-skipanin er so eisini komin sum steinur oman á byrðu hjá mangari fyritøku.

Bakaravinnan er nú av álvara hótt, og tey mongu, sum eru knýtt at hesi vinnu, eru í vanda at gerast arbeiðsleys.

Orsakað av tiltøkum landsstýrisins, eru føroysku breyðvørumar nú munin dýrari, samstundis sum útlendskar breyðvørur í stórum tali verða innfluttar og seldar fyri munandi lægri kostnað.

Hlenda mannagongd kemur at geva føroysku bakaravinnuni mønustingin.

Landsstýrið tykist at hava gloymt, at kappingarfortreytirnar hjá føroysku bakaravinnuni ikki eru tær somu, sum hjá kappingarneytum uttanlands.

Bert fyri at nevna eitt dømi, eigur orkuprísurin at havast í huga.

Henda skeiva gongd eigur at steðgast, og má landsstýrið tí sum skjótast taka neyðug stig og forða fyri, at bakaravinnan her á landi fer fyri bakka.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 120/1992: Viðvíkjandi innflutningi av breyðvørum.*

Málið er lagt fram av Tordi J. Niclasen, løgtingsmanni, tann 16. mars 1993 og eftir 1. viðgerð tann 24. mars 1993 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið. Á fundi við Jógvan Sundstein, landsstýrismann, hevur nevndin fingið frágreiðing um tað arbeiði, sum verður gjørt fyri at greina og granska skipanir, ið kunnu verða kappingaravlagandi fyri ymisk handverk í Føroyum, herímillum bakaravinnuna. Landsstýrið kemur við uppskoti hesum viðvíkjandi í næstum, og kunnu vit tí vænta, at endurgjaldsskipanir í hesum sambandi verða samtyktar.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jacob Lindenskov, Jørgen Niclasen og Óli Breckmann) tekur ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Finnbogi Arge) tekur undir við uppskotinum og vísir á, at føroyska bakaravinnuni í løtuni kappast við útlendska framleiðslu, sum fær almennan stuðul. Minnilutin mælir tinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Lasse Klein) tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskotið.

# 121. Broytingar í meirvirðisgjaldsskipanini

## Uppskot

## til

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 við seinni broytingum um meirvirðisgjald, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 2, stk. 3 verður undir nýggjum litra "o" sett: ull, mjólk, seyðakjøt,

*lagtingslov om ændring i lagtingslov om meromsætningsafgift.*

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 136 fra 8. september 1992 med senere ændringer om meromsætningsafgift foretages følgende ændringer:

1. I § 2, stk. 3 indsættes under nyt litra "o": uld, mælk, fårekød, okse-

| | |
|---|---|
| neytakjøt, svínakjøt, gæs, høsn, dunnur, egg, grønmeti, eplir, fiskur, grind, skip, fuglur, røtur og hoyggj. | kød, svinekød. gæs, høns, ænder, æg, grønsager, kartofler, fisk, grind, spæk, fugl, rødder og hø. |
| 2. Í § 2, stk. 3 verður undir nýggjum litra "þ" sett: "ljóðbond til sjónbrekað". | 2. I § 2, stk. 3 indsættes under nyt litra "þ": "lydbånd" til synshæmmede." |
| § 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. | § 2. Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse. |

**Viðmerkingar:**

Í hesum arbeiðsloysistíðum er tað av stórum týdningi, at landbúnaðurin fær so góðar møguleikar sum gjørligt at mennast, og tí er tað beinleiðis ógagnligt fyri henda, at MVG er lagt oman á tað, vit kunnu kalla náttúrliga ríkidømi landbúnaðarins.

Nógvar av hesum vørum eru ein partur av dagliga húsarhaldinum, og átti tí eisini at verið undantikið MVG - ikki minst, nú tað av álvara gerst trupult hjá mongum húski kring landið - við manglandi arbeiði og einum arbeiðsloysisískoyti, ið svarar bert til 35% av eini arbeiðsmannaløn.

Bøkur sleppa undan MVG og má tað metast sum eitt mistak, at ljóðbond til sjónveik ikki eru við í undantøkunum.

Ljóðbond eru í veruleikanum "bøkur" teirra sjónveiku, og áttu sostatt at fingið somu sømdir sum "vanligar" bøkur.

Hetta má tí fáast í rættlag sum skjótast, og verður tí skotið upp, at gera broyting í lógini hesum viðvíkjandi.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 121/1992: Broytingar í lógini um MVG.*

Málið er lagt fram av Tordi J. Niclasen, løgtingsmanni, tann 22. mars 1993 og eftir 1. viðgerð 25. mars 1993 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur á fundi við Jógvan Sundstein, landsstýrismann, fingið váttan um, at skipað verður so fyri, at t.d. ljóðbond til sjónbrekað sleppa undan cykagjøldum.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jacob Lindenskov, Jørgen Niclasen og Óli Breckmann og Finnbogi Arge) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Lasse Klein) tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskotið.

# 122. Góðsku- og vrakieftirlit fyri saltfisk

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Landsstýrinum verður álagt at fáa gomlu vrakaralógina aftur at virka fyri útflutningin av saltfiski, sum er um at steðga fullkomiliga upp, tí at keyparin fær ikki ta trygd og ta vøru, hann vil hava.

**Viðmerkingar:**

Saltfiskur hevur verið føroyingum ein góð útflutningsvøra, og meira hevur ligið eftir í útflutningsliðinum av kvotuni, tá ið fiskurin hevur verð saltaður. Lutfallið millum saltfisk og flak hevur verð 2,30 og 3,06.

Tí er tað ein spuringur, um tað er rætt gongd, at saltfiskaframleiðslan minkar so nógv, sum hon ger í løtuni. Tað er vandi fyri, at hon heilt fellur burtur.

Spania, Italia, Portugal og Grikkaland eru londini, sum keypt hava mest av saltfiski úr Føroyum tey seinastu árini.

Gamli klippfiskamarknaðurin í Brasilia og Suðuramerika er gloppin okkum av hondum fyri nógvum árum síðan. Spell er, um tað sama skal fara at henda við hinum katólsku londunum í Suðureuropu, bara tí at keyparin ikki fær ta góðsku og tann fisk, hann fyrr fekk og vil hava.

Útflutningurin av saltaðum toski hevur tey seinastu árini verið hesin sinb. Hagdeildini:

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **1985:** | 10.354 | tons | fyri | 215,9 | mió. | kr. |
| **1990:** | 8.541 | " | " | 242,8 | " | " |
| **1991:** | 8.558 | " | " | 278,5 | " | " |
| **1992:** | 6.846 | " | " | 202,9 | " | " |

Fyri at bøta um støðuna og fáa betri prís, sum altíð fæst fyri eina góða vøru verður skotið upp, at gamla vrakaralógin aftur fer at virka fyri útflutingin av saltfiski.

Vrakieftirlitsmenninir, ið vóru, sita við hús og fáa fulla løn. Teir kunnu hóskandi taka sær av at veita trygd fyri, at saltfiskurin verður vrakaður, sum keyparin vil hava tað, uttan at tað gevur landinum nakran eyka kostnað.

**Álit**

**í**

*løgtingsmáli nr. 122/1992: Góðsku- og vrakieftirlit fyri saltfisk.*

Málið er lagt fram av Kristiliga fólkaflokkinum Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 16. mars 1993 og eftir 1. viðgerð 18. mars beint í fiskimálanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið. Nevndin vísir á løgtingsmál nr. 161/1992: Løgtingslóg um fiskavraking, sum er lagt fram av fleiri løgtingsmonnum, og sum er lógaruppskot um sama mál sum fyriliggjandi uppskot til samtyktar. Nevndin tekur tí ikki undir við uppskotinum og setir eingi uppskot fram.

# 123. Broyting í løgtingslóg um skatt av vinningi í samband við sølu av virðisbrøvum

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skatt av vinningi í samband við sølu av virðisbrøvum.*

*lagtingslov om ændring i lagtingslov om skat af fortjeneste i forbindelse med salg af værdipapirer.*

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 40 frá 17. apríl 1986 um skatt av vinningi í samband við sølu av virðisbrøvum verða gjørdar hesar broytingar:

§ 1.

I lagtingslov nr. 40 af 17. april 1986 om skat i forbindelse med salg af værdipapirer foretages følgende ændringer:

1) § 2, stk. 2, 2. pkt. verður orðað soleiðis:
"Tapið kann dragast frá 5 tey næstu árini".

2) Sum nýggj § 4a verður sett:
"Av vinningi í sambandi við sølu av partabrøvum, sum fer fram trý ár ella seinni aftan á útveganina av partabrøvunum, verður eitt avgjald latið í teimum førum, sum eru nevnd í 2. og 3. stk. eftir reglunum í § 4c.

**Stk. 2.** Avgjaldsskylda eftir 1. stk. fyriliggur, tá ið hin skattskyldugi selur partabrøv í einum partafelag, har viðkomandi onkuntíð innanfyri tey seinastu 5 árini undan partabrævasøluni hevur átt 25% ella meira av partapeninginum ella rátt yvir meira enn 50% av atkvøðuvirðinum. Við uppgerð av partapeninginum í einum felag verður sæð burtur frá felagsins egnu partabrøvum.

**Stk. 3.** Í sambandi við avgerðina av, um hin skattskyldugi, herundir deyðsbúgvið hjá tí skattskylduga, hevur átt í minsta lagi 25% av partapeninginum í einum felag ella rátt yvir meira enn 50% av tí samlaða atkvøðuvirðinum, verða tald við tey partabrøv, sum hjúnafelagin hjá tí skattskylduga samstundis átti, og somuleiðis hansara foreldur og abbar og ommur, umframt børn og barnabørn og hjúnafelagar hjá hesum ella deyðsbúgv eftir nevndu persónar. Partabrøv, sum ein fyrrverandi hjúnafelagi til teir í 1. pkt. nevndu persónar hevur átt, og partabrøv, sum ein núverandi hjúnafelagi til teir í 1. pkt. nevndu

1) § 2, stk. 2, 2. pkt. affattes således:
"Tabet kan fradrages i de næste 5 år".

2) Som ny § 4a indsættes:
"Af fortjeneste i forbindelse med afståelse af aktier på et tidspunkt, der ligger tre år eller mere efter erhvervelsen af aktierne, erlægges en afgift i de tilfælde, der er nævnt i stk. 2 og 3, efter de i § 4c nævnte regler.

**Stk. 2.** Afgiftspligt efter stk. 1 foreligger, når den skattepligtige afstår aktier i et aktieselskab, hvori den pågældende på noget tidspunkt inden for de seneste 5 år forud for aktieafståelsen har ejet 25% eller mere af aktiekapitalen eller rådet over mere end 50% af stemmeværdien. Ved opgørelsen af aktiekapitalen i et selskab bortses der fra selskabets beholdning af egne aktier.

**Stk. 3.** Ved afgørelsen af, om den skattepligtige, herunder den skattepligtiges dødsbo, har ejet mindst 25% af aktiekapitalen i et selskab eller rådet over mere end 50% af den samlede stemmeværdi, medregnes aktier, der samtidig tilhørte den skattepligtiges ægtefælle, forældre og bedsteforældre samt børn og børnebørn og disses ægtefæller eller dødsboer efter de nævnte personer. Aktier, tilhørende en tidligere ægtefælle til den i 1. pkt. nævnte personkreds, og aktier, som en nuværende ægtefælle til den i 1. pkt. nævnte personkreds har afstået før ægteskabets indgåelse, medregnes dog ikke. End-

persónar hevur selt áðrenn giftuna, verða ikki roknaði við. Herumframt verða partabrøv tald við, sum hoyrdu til feløg, um so er, at nevndu persónar frammanfyri, orsakað av partabrævaogn, viðtøkum, avtalu ella felags leiðslu, hava havt eina avgerðandi ávirkan.

**Stk. 4.** Tap við avhending av partabrøvum, sum fer fram trý ár ella seinni aftan á útveganina av partabrøvunum, kann í teimum førum, har vinningur vildi verðið avgjaldsskyldugur eftir 2., og 3. stk., bert dragast frá í staðfestum vinningi við sølu av høvuðspartaeigarapartabrøvum aftan á meira enn 3 árs ognartíð, sbr. eisini reglurnar í § 2."

3) Sum nýggj § 4 b verður sett:

"Um hin skattskyldugi onkuntíð innanfyri tey seinastu 5 árini undan avhendingini sjálvur ella saman við teimum í § 4 a, 3. stk. nevndu persónum hevur átt partabrøv ella hevur rátt yvir atkvøðuvirðinum, sum nevnt í § 4a, stk. 2 og 3, verður vinningur ella tap í samband við søluna gjørt upp sum munurin millum útveganarupphædd og søluupphædd fyri avvarðandi partabrøv."

4) Sum nýggj § 4c verður sett:

"Av vinningi, sum verður uppgjørdur eftir § 4b, og sum er avgjaldsskyldugur eftir § 4a, verður latið eitt avgjald upp á 25%. Við avhending aftan á 10. árið aftan á útveganina av partabrøvunum, verður einki avgjald latið av vinningi.

videre medregnes aktier, som tilhørte selskaber, hvorover den nævnte personkreds på grund af aktiebesiddelse, vedtægtsbestemmelse, aftale eller fælles ledelse har haft en bestemmende indflydelse.

**Stk. 4.** Tab ved afståelse af aktier på et tidspunkt, der ligger tre år eller mere efter erhvervelsen af aktierne, kan i de tilfælde, hvor en fortjeneste ville være blevet afgiftspligtig efter stk. 2 og 3, kun fradrages i konstateret fortjeneste på afståede hovedaktionæraktier efter mere end 3 års ejertid, jf. også reglerne i § 2."

3) Som ny § 4 b indsættes:

"Hvis den skattepligtige på noget tidspunkt indenfor de seneste 5 år forud for afståelsen selv eller sammen med den i § 4 a, stk. 3 angivne kreds af personer, har ejet aktier eller rådet over stemmeværdien, som angivet i § 4 a, stk. 2 og 3, opgøres fortjeneste eller tab ved afståelse som forskellen mellem anskaffelsessummen og afståelsessummen for de pågældende aktier."

4) Som ny § 4 c indsættes:

"Af fortjeneste, der opgøres efter § 4 b, og som er afgiftspligtig efter § 4 a, erlægges encafgift på 25%. Ved afståelse efter det 10. år efter aktiernes erhvervelse, erlægges ingen afgift af fortjeneste.

**Stk. 2.** Tað áliggur tí skattskylduga, at rinda tað í 1. stk. nevnda avgjald til Føroya Gjaldstovu. Rindan av avgjaldinum verður roknað at vera rættstundis, tá ið goldið verður í seinasta lagi ein mánaða aftan á sølu av partabrævi.

**Stk. 3.** Um avgjaldið ikki er goldið rættstundis sambært 2. stk., skal renta rindast av avgjaldinum við 1% um mánaðin frá gjaldkomudegi at rokna, til goldið verður.

**Stk. 4.** Renta sambært 3. stk., kann ikki verða frádrigin í skattskyldugu inntøkuni. Reglurnar í § 135, 3. stk. í samtíðarskattalógini um rættin at panta avgjaldið við afturatkomnum rentum, er galdandi í hesum føri.

**Stk. 5.** Avgjaldið verður býtt við 40% til avvarðandi kommunu og 60% til landskassan.

**§ 2.**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur gildi fyri sølu av partabrøvum henda dag ella seinni.

**2. stk.** Det påhviler den skattepligtige at indbetale den i stk. 1. nævnte afgift til Føroya Gjaldstova. Indbetaling af afgiften anses for rettidig, når den finder sted senest en måned efter afståelse af aktie.

**3. stk.** Er den i henhold til stk. 2 nævnte afgift ikke indbetalt rettidigt, påløber der afgiften renter med 1% pr. påbegyndt måned fra sidste rettidige indbetalingsdag at regne, til afgiften er betalt.

**4. stk.** Den i stk. 3 omhandlede rente, kan ikke fratrækkes i den skattepligtige indkomst. Reglerne i § 135, stk. 3 i skatteloven om retten til udpantning af afgiften med påløbne renter, finder tilsvarende anvendelse.

**5. stk.** Afgiften fordeles med 40% til pågældende kommune og 60% til landskassen.

**§ 2.**

Denne lagtingslov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse, og har virkning for afståelse af aktier, der sker denne dato eller senere.

**Viðmerkingar:**

Í viðmerkingum til uppskot landsstýrisins til lógarbroytingar í samtíðarskattalógini í november mánaði 1992 varð m.a. nevnt, at landsstýrið ætlar í næstu framtíð at seta fram uppskot um broyting av virðisbrævaskattalógini, so tað í framtíðini verður gjørdur ávísur skattligur munur á partabrævasølu hjá høvuðspartaeigarum í mun til aðrar partaeigarar.

Fyriliggjandi uppskot landsstýrisins, um broyting í løgtingslóg um skatt av vinningi, í sambandi við sølu av virðisbrøvum og løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt, er soleiðis framhald av ætlan landsstýrisins frá november, um at broyta deils virðisbrævalógina soleiðis, at vinningur av partabrævasølu hjá høvuðspartaeigarum, sum fer fram trý ár ella seinni aftan á útveganina av partabrøvunum, verður avgjaldsskyldugur í teimum førum, sum eru nevnd í § 4a, 2. og 3. stk. í uppskotinum.

Við virðisbrævalógini frá 1986, var ætlanin at broyta lóggávuna soleiðis, at staðfestur kursvinningur í sambandi við sølu av virðisbrøvum, sum áður hevði verið skattafríur, tá varð skattaður eins og onnur inntøka.

Frammanundan hevði galdandi lóggáva, einans heimilað skattseting av vinningi við sølu av virðisbrøvum í teimum serstøku førum, har tað við vissu kundi staðfestast, at hetta virksemið hevði eitt beinleiðis vinnuligt endamál (spekulatión).

Hetta varð gjørt soleiðis, at í fyrsta lagi varð tílíkur vinningur skattaður í øllum teimum førum, har talan var um vinnuligt virksemi, í øðrum lagi, tá ið skattgjaldarin selur virðisbrævið áður enn 3 ár eftir, at virðisbrævið er útvegað.

Vinningur ella tap annars, sum er ásannað meira enn 3 ár eftir, at útveganin er fariu fram, verður soleiðis ikki roknað upp í skattskyldugu inntøkuna. Undantikin eru tey føri, tá ið talan er um vinnuligt virksemi, sbr. § 3 í lógini.

Við hesum uppskoti landsstýrisins kemur tó vinningur í samband við sølu av partabrævi hjá høvuðspartaeigara, sum fer fram trý ár ella seinni aftan á útveganina av partabrøvunum, at verða avgjaldsskyldugur við 25% í teimum førum, sum nevnd eru í § 4a, 2. og 3. stk., og verður hesin vinningur soleiðis ikki roknaður upp í skattskyldugu inntøkuna.

Vinningur ella tap við sølu áðrenn 3 ár aftan á útveganina verður tó viðgjørt sum vinningur ella tap upp á vanlig partabrøv eftir galdandi reglum í virðisbrævalógini, sbr. § 2.

Samanumtikið verður vinningur av partabrævasølu hjá høvuðspartaeigara tey fyrstu 3 árini aftan á útveganina roknaður sum vanlig skattskyldug inntøka. Við sølu aftan á 3 ár eftir útveganina, verður vinningur álagdur eitt avgjald upp á 25%, sum er endaligt. Og við sølu aftaná 10. ár eftir útveganina av partabrøvunum, verður einki avgjald latið av vinningi, og hesin skal heldur ikki takast við í skattskyldugu inntøkuna. Víst verður eisini til viðmerkingarnar til § 120 í skattalógini, sum verður lagt fyri løgtingið samstundis.

**Til § 2, 2. stk.**

Talan er um eina dagføring, soleiðis at tap kann dragast frá 5 tey næstu árini. Galdandi regla ásetir, at tap kann dragast frá 3 tey næstu árini. Tapið kann tá eins og hall eftir § 33, nr. 5) í samtíðarskattalógini, dragast frá innanfyri tey 5 næstu árini, og kann her eisini vísast til uppskotnu reglurnar og viðmerkingarnar undir pkt. 2)-4) um partabrævasølu hjá høvuðspartaeigara.

**Til § 4a:**

Skotið verður í 1. stk. upp, at vinningur í samband við sølu av partabrøvum, sum fer fram 3 ár ella seinni aftan á útveganina, verður avgjaldsskyldugur í teimum førum, sum nevnd í 2. og 3. stk. Ávísingin til § 4c merkir, at av vinningi verður

latið eitt avgjald upp á 25%, tó soleiðis, at við sølu aftan á 10. árið eftir útveganina av partabrøvunum, verður einki avgjald latið. Søla tey fyrstu 3 árini aftan á útveganina verður viðgjørd eftir galdandi reglum, sbr. § 2 í lógini. Aftaná 3 ár, verður soleiðis vinningur við sølu av partabrævi hjá høvuðspartaeigara ikki roknaður upp í skattskyldugu inntøkuna, men verður eitt avgjald upp á 25% tikið í staðin.

Uppskotnu reglurnar verða nýttar við sølu av partabrøvum í einum partafelag, um hin skattskyldugi onkuntíð innanfyri tey seinastu 5 árini undan søluni hevur átt 25% ella meira av partapeninginum ella rátt yvir meira enn 50% av atkvøðunum í felagnum.

Í samband við hesa avgerð viðv. teimum 25% og 50% verður sæð burtur frá felagsins egnu partabrøvum.

Soleiðis verður her skotið upp, at ein partacigari er høvuðspartacigari í hesum samanhangi, um viðkomandi innanfyri seinastu 5 árini áðrenn søluna hevur átt 25% ella meira av partapeninginum í felagnum ella hevur rátt yvir meira enn 50% av atkvøðunum í felagnum.

5-ára reglan førir við sær, at partaeigarin framhaldandi verður verandi høvuðspartacigari í upp til 5 ár aftaná, at viðkomandi ikki longur lýkur treytirnar í § 4a, stk. 2. Fyri at verða uttanfyri høvuðspartaeigaraskatting er tað soleiðis ein treyt, at tað við søluna eru gingin minst 5 ár, síðan partacigarin møguliga saman við nærstandandi (sbr. § 4a, 3. stk.), hevur rátt yvir minst 25% av partapeninginum, ella meira enn 50% av atkvøðuvirðinum.

Hevur partaeigarin innanfyri tey síðstu 5 árini áðrenn søluna havt 25% av partapeninginum ella meira enn 50% av atkvøðuvirðinum, er tað uttan týdning, um talan bert var um eina styttri partabrævavarðveitslu.

Hóast skattgjaldarin ikki sjálvur lýkur omanfyri nevndu treytir (viðv. 5 ár / 25% / 50%), kann hann kortini blíva skattaður sum høvuðspartacigari. Hetta, tí at partabrøv hjá skattgjaldarans nærstandandi eisini verða roknað uppí, sbr. § 4a, 3. stk.

Í stk. 4 er ásett, at tap við sølu 3 ár ella seinni aftan á útveganina av partabrøvum í teimum førum, har vinningur vildi verðið avgjaldsskyldugur eftir 2. og 3. stk., bert kann dragast frá í staðfestum vinningi við sølu av høvuðspartacigarabrøvum aftan á meira enn 3 árs ognartíð. Annars verða reglurnar í § 2 í lógini galdandi. Tap kann soleiðis í hesum førum bert dragast frá í ásannaðum vinningi í samband við sølu av høvuðspartaeigarabrøvum aftan á meira enn 3 árs ognartíð, t.v.s. ikki í aðrari inntøku enn júst einari nettoinntøku stavandi frá slíkari sølu av høvuðspartaeigarabrøvum. Við broytingini til § 2, stk. 2, 2. pkt. í hesum lógaruppskoti verður somuleiðis skotið upp, at tapið, eins og hall sambært § 33, nr. 5) í samtíðarskattalógini, einans kann dragast frá innan fyri tey 5 næstu árini, soleiðis at frádráttarmøguleikin fellur burtur, tá áselta tíðin er umliðin. Frádráttur kann

ikki flytast til eitt seinni inntøkuár, um møguleiki er fyri at draga tapið frá í inntøku av høvuðspartaeigarabrøvum í einum ári frammanundan, sbr. § 2, 2. stk.

**Til § 4b:**
Her verður ásett, hvussu vinningurin við sølu verður uppgjørdur. Hesin verður uppgjørdur ájavnt við munin millum útveganar- og søluupphædd.

**Til § 4c:**
Av vinningi, uppgjørdur eftir § 4b, og sum er avgjaldsskyldugur eftir § 4a, verður skotið upp, at latið verður eitt avgjald upp á 25%. Her fer søla fram 3 ár ella seinni aftan á útveganina av partabrøvunum. Við sølu aftan á 10. árið aftan á útveganina av partabrøvunum, verður einki avgjald latið.

Í 2.-4. stk. eru ásettar reglar um rindan av avgjaldinum, rentu og innheinting.

Skotið verður upp, at avgjaldið verður býtt við 40% til avvarðandi kommunu og 60% til landskassan.

Lógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur gildi fyri sølu av partabrøvum, sum fer fram henda dag ella seinni.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 123/1992: Broyting í løgtingslóg um skatt av vinningi í samband við sølu av virðisbrøvum.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum 16. mars 1993 og eftir 1. viðgerð 24. mars beint í skattanevndina.

Uppskot landsstýrisins er ein liður í teim skattabroytingum, sum vórðu fráboðaðar í november 1992 um broyting av virðisbrævaskattalógini.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jacob Lindenskov, Heini O. Ileinesen, Lasse Klein og Jógvan Sundstein) vísir til viðmerkingarnar til tær einstøku greinarnar í framløguuppskoti landsstýrisins og tekur meirilutin undir við uppskotinum og mælir tinginum til at samtykkja tað.

Minnilutin (Finnbogi Arge) vísir á, at søla av virðis- og partabrøvum hevur verið skattskyldug í teimum førum, har talan hevur verið um vinnuligt virksemi, og tá ið skattgjaldarin hevur selt virðis- ella partabrøv, áðrenn 3 ár eru liðin frá útveganardegi. 3. ára reglan var í áttatiárunum sett í gildi fyri at forða fyri skattafríum vinniligum virksemi og spekulatión í virðis- og parabrøvum.

Ætlanin við hesum nýggja uppskoti er at seta lóggávu í verk, sum hevur við sær, at virðis- og partabrævasøla hjá høvuðspartaeigarum verður roknað sum vanlig skattskyldug inntøka, um selt verður áðrenn 3 ár frá útveganardegi. Verður selt aftaná, 3 ár eru liðin og upp til 10 ár frá útveganardegi, skal høvuðspartaeigari skattast við 25% av vinninginum. Við sølu aftan á 10. árið frá útveganardegi, verður vinningurin ikki skattaður.

Skattaherðingin er galdandi fyri øll tey, sum eiga meira enn 25% av partapeninginum í einum virki ella onkuntíð innanfyri tey seinastu 5 árini undan partabrævasøluni hava átt 25% ella meira av partapeninginum ella rátt yvir meira enn 50% av atkvøðuvirðinum.

Vitandi um 3-ára markið hava mangir partaeigarar skotið pening inn í vinnuvirkir og á henda hátt verið við til at skapa arbeiðspláss í landinum. Broytingin fer at hava við sær, at mong fara at aftra seg við at seta pening í føroyska vinnu og fara at søkja aðrar leiðir. Vit mugu síggja í eyguni, at skattaherðingin av høvuðspartabrævaeigarum fer at hava við sær, at peningur, sum kundi verið við til at fingið fleiri arbeiðslcys í vinnu, í staðin fer av landinum.

100 tals mió. eru longu farnar av landinum, av tí at kapitaleigarar ikki kenna seg tryggar. Henda lógin økir um ótryggleikan og fer at hava við sær, at sera vánaliga gjaldførið í landinum verður uppaftur verri.

Við hesum viðmerkingum mælir minnilutin (Finnbogi Arge) tinginum frá at samtykkja uppskotið, sum varð lagt fram av Jógvan Sundstein, fyrrverandi landsstýrismanni í fíggjarmálum.

# 124. Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verða hesar broytingar gjørdar:

*lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.*

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) Í § 120 verður sett sum nýtt 4. stk.:

"Nevndir fyri partafeløg eru skyldugar eftir áheitan ókeypis at lata líkningarráðnum allar tær upplýsingar, sum hesar hava um navn, føðingardag og bústað hjá persónum, feløgum v.m., sum eru ella innanfyri eitt nærri ávíst tíðarskeið hava verið eigarar av partabrøvum í felagnum, og um støddina av partabrøvunum hjá viðkomandi v.m. ella atkvøðurættinduni. Líkningarráðið kann lata teir soleiðis fingnu upplýsingarnar víðari til partaeigarar í felagnum, um so er, at viðkomandi partaeigarar ikki sjálvir hava atgongd til hesar upplýsingar. Tað er tó ein fyritreyt, at partaeigarin antin hevur selt ella hevur givið tilboð um sølu av partabrøvum, bert treytað av, at hann ikki er umfataður av § 4 a, stk. 2 og 3 í løgtingslóg um skatt av vinningi í samband við sølu av virðisbrøvum."

1) I § 120 indsættes som nyt stk. 4:

"Bestyrelser for aktieselskaber skal på forlangende gratis give ligningsrådet alle de oplysninger, de er i besiddelse af, om navn, fødselsdag og adresse på personer, selskaber m.v., som er eller inden for et nærmere angivet tidsrum har været ejere af aktier i selskabet, samt om størrelsen af de pågældendes aktieposter m.v. eller stemmerettigheder. Ligningsrådet kan videregive de således modtagne oplysninger, til aktionærer i selskabet, hvis de pågældende aktionærer ikke selv har adgang til disse oplysninger. Det er dog en forudsætning, at aktionæren enten har solgt eller har afgivet tilbud om salg af aktierne alene betinget af, at han ikke er omfattet af § 4 a, stk. 2 og 3 i lagtingslov om skat af fortjeneste i forbindelse med salg af værdipapirer."

2) Í § 120 verður sett sum nýtt 5. stk.:

"Persónar og feløg, sum eiga í minsta lagi 25% av partapeningunum ella ráða yvir meira enn 50% av tí samlaða atkvøðuvirðinum, hava skyldu til at upplýsa felagnum um sítt navn, føðingardag og bústað. Fyri persónar verða eigaraviðurskiftini gjørd á tann hátt, sum er nevnt í § 4 a, stk. 2-3 í virðisbrævaskattalógini."

2) § 120 indsættes som nyt stk. 5:

"Personer og selskaber, der ejer mindst 25% af aktiekapitalen eller råder over mere end 50% af den samlede stemmeværdi, har pligt til at oplyse selskabet om sit navn, fødselsdag og adresse. For personer opgøres ejerforholdet på den måde, der er anført i aktieavancebeskatningsloven § 4a, stk. 2-3."

3) Í § 120 verður sett sum nýtt 6. stk.:

"Partafelagið skal saman við sjálv-

3) I § 120 indsættes som nyt stk. 6:

"Aktieselskabet skal vedlægge

uppgávuni leggja eitt yviriit yvir teir persónar og feløg, sum í inntøkuárinum hava verið umfataðir av upplýsingarskylduni eftir 5. stk., við teimum harí nevndu upplýsingum."

§ 2.

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

selvangivelsen en fortegnelse over de personer og selskaber, der i løbet af indkomståret har været omfattet af oplysningspligten efter stk. 5, indeholdende de i bestemmelsen nævnte oplysninger."

§ 2.

Denne lagtingslov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

**Viðmerkingar:**

Skotið verður upp, at broyta reglurnar í § 120 í skattalógini, sum ein fylgjubroyting av teimum uppskotnu broytingunum í virðisbrævalógini § 4a-§ 4c, sum soleiðis hanga saman, og sum verða løgd fyri løgtingið saman, tó sum tvey lógaruppskot. Viðv. broytingini til § 120 í skattalógini verður skotið upp í framhaldi av broytingini í virðisbrævalógini, at líkningarráðið hevur møguleika fyri frá nevndini í felagnum at fáa upplýsingar um partabrævaeigarar í felagnum, støddd av partabrøvum hjá viðkomandi ella atkvøðurættindi. Hetta til tess at kunna avgera, um ein skattgjaldari er umfataður av høvuðspartabrævaskatting eftir virðisbrævalógini. Í fall viðkomandi ikki sjálvur hevur so stór partabrævavirði ella atkvøðuvirði, at hann sjálvur kann blíva umfataður av høvuðspartabrævaskatting, kann viðkomandi partaeigari og skattavaldið hava tørv á at fáa upplýsingar um persónar ella feløg innanfyri umrøddu nærstandandi eiga partabrøv ella ráða yvir atkvøðurættindum í felagnum.

Eftir § 120, 4. stk. verður skotið upp, at nevndir í partafeløgum lata líkningarráðnum tær upplýsingar, sum hesar hava um partafelagsviðurskiftini í felagnum.

Ein skattgjaldari, sum ikki er umfataður av høvuðspartaregluni av sínum egnu partabrøvum í einum felag, kann - áðrenn hann selur partabrøv í felagnum - hava tørv fyri at vita, um hann orsakað av partabrøvum hjá nærstandandi v.m., er umfataður av høvuðspartaeigaraskattingini. Skotið verður upp, at líkningarráðið undir ávísum treytum kann lata móttiknar upplýsingar um partabrævaviðurskifti í feløgum v.m. víðari til skattskyldugar. Hesin skal tó hava ein aktuellan, rættarligan og skattligan áhuga í at fáa hesar upplýsingar útflýggjaðar.

Persónar og feløg, sum eiga í minsta lagi 25% av partapeninginum, ella ráða yvir meira enn 50% av tí samlaða atkvøðuvirðinum, hava skyldu til at upplýsa felagnum um sítt navn, føðingardag og bústað, sbr. § 120, 5. stk.

Í § 120, 6. stk. er ásett, at felagið saman við sjálvuppgávuni skal leggja við eitt yvirlit yvir teir persónar og feløg, sum í inntøkuárinum hava verið umfataðir av upplýsingarskylduni í 5. stk. við teimum har nevndu upplýsingunum.

Annars kann eisini vísast til viðmerkingarnar til uppskot um broyting í virðisbrævalógini.

## Álit

í

*løgtingsmáli nr. 124/1992: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum 16. mars 1993 og eftir 1. viðgerð 24. mars beint í skattanevndina.

Uppskotið er liður í teimum broytingum av skattalógini við tí fyri eyga at veita likningarvaldinum upplýsingar um partafelagsviðurskifti.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jacob Lindenskov, Heini O. Heinesen, Lasse Klein og Jógvan Sundstein) mælir til at samtykkja uppskotið.

Minniluti (Finnbogi Arge) vísir til viðmerkingar minnilutans til løgtingsmál nr. 123/1992. Minnilutin tekur ikki undir við málinum.

# 125. Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

## Uppskot

## til

*broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.*

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 46 stk. 1 verður orðað soleiðis:
Kommunuskattur verður álíknaður av somu skattskyldugu inntøku,

*ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.*

§ 1.

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) § 46, stk. 1 affattes således:
Kommuneskatten pålignes af samme skattepligtige indkomst, som

sum nýtt verður, tá landsskatturin verður álíknaður. Fyri 1995 verður tó eingin kommunuskattur álíknaður skattskyldugari inntøku frá 0 til 12.600 kr. Upphæddin í pkt. 2 verður broytt soleiðis:

| | |
|---|---|
| fyri 1996 0 til 13.200 kr. | for 1996 0 til 13.200 kr. |
| fyri 1997 0 til 13.800 kr. | for 1997 0 til 13.800 kr. |
| fyri 1998 0 til 14.400 kr. | for 1998 0 til 14.400 kr. |
| fyri 1999 0 til 15.000 kr. | for 1999 0 til 15.000 kr. |
| fyri 2000 0 til 15.800 kr. | for 2000 0 til 15.800 kr. |
| fyri 2001 0 til 16.600 kr. | for 2001 0 til 16.600 kr. |
| fyri 2002 0 til 17.400 kr. | for 2002 0 til 17.400 kr. |
| fyri 2003 0 til 17.900 kr. | for 2003 0 til 17.900 kr. |
| fyri 2004 0 til 18.400 kr. | for 2004 0 til 18.400 kr. |
| fyri 2005 0 til 19.900 kr. | for 2005 0 til 19.900 kr. |
| fyri 2006 0 til 20.400 kr. | for 2006 0 til 20.400 kr. |
| fyri 2007 0 til 20.900 kr. | for 2007 0 til 20.900 kr. |
| fyri 2008 0 til 21.400 kr. | for 2008 0 til 21.400 kr. |
| fyri 2009 og framyvir 0 til 22.000 kr. | for 2009 og fremover 0 til 22.000 kr. |

anvendes ved påligningen af landsskatten. For 1995 pålignes dog ingen kommuneskat af den skattepligtige indkomst fra 0 til 12.600 kr. Beløbet i pkt. 2 ændres således:

2) Sum nýggj § 46 c verður sett:

Í § 46, stk. 2 og stk. 5 og í § 46 a, stk. 1, stk. 2 og stk. 3 verður "13%" broytt soleiðis:

| | |
|---|---|
| í 1995 til "12,5%" | i 1995 til "12,5%" |
| í 1996 til "12,-%" | i 1996 til "12,-%" |
| í 1997 til "11,5%" | i 1997 til "11,5%" |
| í 1998 til "11,-%" | i 1998 til "11,-%" |
| í 1999 til "10,-%" | i 1999 til "10,-%" |
| í 2000 til "9,-%" | i 2000 til "9,-%" |
| í 2001 til "8,-%" | i 2001 til "8,-%" |
| í 2002 til "7,-%" | i 2002 til "7,-%" |
| í 2003 til "6,-%" | i 2003 til "6,-%" |
| í 2004 til "5,-%" | i 2004 til "5,-%" |
| í 2005 til "4,-%" | i 2005 til "4,-%" |
| í 2006 til "3,-%" | i 2006 til "3,-%" |
| í 2007 til "2,-%" | i 2007 til "2,-%" |
| í 2008 til "1,-%" | i 2008 til "1,-%" |
| í 2009 og framyvir til "0%" | i 2009 og fremover til "0%". |

2) Som ny § 46 c indsættes:

I § 46, stk. 2 og stk. 5 og i § 46a, stk. 1, stk. 2 og stk. 3 ændres "13%" således:

3) Í § 54 verður sum nýtt stk. 3 sett:

Lækkingin í landsskatti og kommunuskatti kann tó í mesta lagi verða ájøvn tí lækking, ið svarar til lækkingina við einum kommunuskattaprosenti upp á 20%.

4) Í § 54 verður sum nýtt stk. 4 sett:

Um eykaskattur er ásettur, verður lækkingin eftir stk. 2 gjørd, tá samlaði inntøkuskatturin, herí eisini eykaskatturin, fer upp um prosentið á hægsta stigi á eykaskattastiganum og teimum í stk. 2 nevndu 50% tilsamans.

5) Í § 64 verður sum nýtt stk. 5 sett:

Um eykaskattur er ásettur, hækkar prosentið í stk. 1 við prosentinum á hægsta stigi á eykaskattastiganum.

**§ 2.**

Hendan løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Stk. 2.** Tó koma broytingarnar nr. 1) og 2) í gildi 1. januar 1995, og broyting nr. 3) í gildi 1. januar 1994.

3) I § 54 indsættes som nyt stk. 3:

Nedsættelse i landsskatten og kommuneskatten kan dog højest udgøre den nedsættelse, der svarer til en kommuneskatteprocent på 20%.

4) I § 54 indsættes som nyt stk. 4:

Såfremt der er udskrevet ekstraskat, sker nedsættelsen efter stk. 2, når den samlede indkomstskat, inklusive ekstraskatten, overstiger procenttallet på højeste trin på ekstraskatteskalaen plus de i stk. 2 nævnte 50%.

5) I § 64 indsættes som nyt stk. 5:

Såfremt der er udskrevet ekstraskat, forhøjes procenttallet i stk. 1 med procenttallet på højeste trin i ekstraskatteskalaen.

**§ 2.**

Denne lagtingslov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

**Stk. 2.** Dog træder ændringen nr. 1) og 2) i kraft 1. januar 1995 og ændring nr. 3) træder i kraft 1. januar 1994.

**Felagsviðmerking:**

Fyriliggjandi uppskot landsstýrisins til broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt og løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan er fyrst og fremst ein liður í einum framhaldandi arbeiði við at leggja skattaskipanina um til eina bruttoskattaskipan.

Tá tær seinast gjørdu lógarbroytingarnar í skattalóggávu okkara vóru til viðgerðar í Løgtinginum í des. 1992 og eitt nú samtykt varð, at lækka privata rentufrádráttin úr 42% til 40%, taka av ymiskar frádráttir, so sum ferðafrádrátt, persónsfrádrátt og løntakarafrádrátt varð samstundis innbygt í skattastiga okkara eitt skattastig svarandi til ein botnfrádrátt upp á 22.500 kr. í skattskyldugu inntøkuni til landskassan og til 12.000 kr. í skattskyldugu inntøkuni til kommunukassarnar.

tøkuni til landskassan og til 12.000 kr. í skattskyldugu inntøkuni til kommunukassarnar.

Tá lógaruppskotið var til viðgerðar í skattanevndini, setti meirilutin til 2. viðgerð fram uppskot til samtyktar, um at áleggja landsstýrinum at leggja fyri løgtingið lógaruppskot við raðfesting av ætlaðu broytingum í skattalógini fyri hvørt árið, so gjørt verður greitt, hvussu umleggingin frá núgaldandi frádráttum til hækkandi botnfrádrátt verður gjørd. Uppskot til samtyktar varð samtykt 22. desember 1992.

Landsstýrið leggur tí her fram eina langtíðarætlan fyri lækking av privata rentufrádráttinum frá teim núgaldandi 40% til heilt at taka av møguleikan fyri frádrátt fyri privatar rentuútreiðslur. Ætlanin at taka av privatan rentufrádrátt er í uppskotinum roknað fram til ár 2009.

Byrjað verður í 1995 við at lækka rentufrádráttin úr 40% til 38%, 0,5% lækking í frádráttinum í kommunuskatti og 1,5% lækking í frádráttinum í landsskattinum. Hendan 2% lækkingin fyri hvørt ár heldur fram til ár 2000, tá lækkingin er 3% fyri hvørt ár fram til ár 2009, tá rentufrádrátturin er komin niður á 0%, og harvið er settur úr gildi.

Samstundis sum rentufrádrátturin lækkar, verður "botnfrádrátturin" í skattskyldugu inntøkuni yvir sama áramál hækkaður frá teim núgaldandi 22.500 kr. og 12.000 kr. til ávikavist 40.000 kr. og 22.000 kr.

Fyritreytin fyri, at tað búskaparliga kann forsvarast at hækka botnfrádráttin er, at tann harav minkandi skattainntøkan fæst inn á annan hátt, og gerst hetta í eini framtíðar bruttoskattaskipan, eftir landsstýrisins metan, mest natúrligt við at avtaka tann privata rentufrádráttin.

Fyri skattgjaldarar við stórari rentubyrðu kemur broytingin sjálvsagt at merkja ein minkandi frádrátt og harvið eina tyngri fíggjarbyrðu. Misti fyrimunurin kemur at merkjast hjá tí einstaka alt eftir hvussu stór rentuskuldin er, og hvat slag av láni talan er um. Men tann hækkandi botnfrádrátturin kemur tó at minka nakað um árini av tí lækkandi rentufrádráttinum, hóast botnfrádrátturin tó sum sagt, ikki kemur at viga heilt upp í móti tí minkandi frádráttinum.

Tá bruttoskattaskipanin er komin so mikið langt áleiðis, at frádrátturin fyri privatar rentuútreiðslur er komin niður á støðið fyri skatting av rentum av innistandandi í føroyskum peningastovnum, minkar skattingin av inntøkurentum samsvarandi víðari lækkingini av frádráttinum fyri rentuútreiðslur.

Samstundis verður eisini skotið upp, at verandi skattahámark í skattalógini verður broytt.

Broytingin verður mett neyðug, nú tá skattaprosentið í fleiri kommunum er hækkað so mikið nógv, at tann aunars fyriskipaða lækkingin í grein 54 í skattalógini kann merkja munandi lækking í skattainntøkunum til landskassan. Mett

verður, at tað ikki er rætt, at ein hækkandi kommunuskattur skal minka um skattainntøkurnar til landskassan.

Sambært núgaldandi reglum, so skal landskassin, so hvørt sum ein kommuna hækkar skattaprosentið, bera ein part av tí lækking, ið stendst av tí hækkaða kommunuskattinum. Harvið fáa kommunurnar ein lutfalsliga størri part av tí samlaða inntøkuskattinum, meðan landsins partur minkar.

Landsstýrið skjýtur tí upp, at ein broyting verður gjørd í galdandi hámarkslækking, so lækkingin ongantíð gerst størri enn lækkingin við einum kommunuskattaprosenti uppá 20.

Hetta merkir, at kommunuskattaprosent, ið eru hægri enn 20% ikki koma at ávirka inntøkurnar til landskassan. Men hetta merkir eisini, at skattgjaldari, sum býr í eini kommunu við hægri kommunuskattaprosenti enn 20, og sum rindar tey fyriskrivaðu 50% + ásettu prosentini í eykaskatti, afturat hesum kann koma at rinda tí upphæddd, ið stavar frá kommunuskattaprosentunum omanfyri 20%. Skattahámarkið uppá 50% (við eykaskattinum 55,5%) kemur tí ikki at verða eitt absolutt hámark, tí eitt kommunuskattaprosent hægri enn 20% kann verða við til at flyta skattahámarkið fyri tann einstaka skattaborgaran.

Verður tikið eitt dømi frá Vestmanna kommunu, sum í løtuni hevur eitt skattaprosent uppá 25,7% íroknað kirkjuskatt, so sær útrokningin soleiðis út.

*Skattskylduga inntøkan er 294.800 kr.*

| | **Landið** | **Kommunan** | **tilsamans** |
|---|---|---|---|
| Bruttoskattur íroknaður eykask. | 93.789 | 72.679 | 166.469 |
| lækking eftir galdandi reglum | 10.743 | 8.325 | 19.068 |
| Nettoskattur eftir galdandi reglum | 83.045 | 64.354 | 147.400 |
| lækking eftir nýggjum reglum | 1.839 | 1.109 | 2.949 |
| Nettoskattur eftir nýggjum reglum | 91.949 | 71.570 | 163.519 |

Landsstýrið mælir eisini í uppskotinum til at hækka tann frádrátt, ið pensjónistar v.m fáa, og sum var ætlaður til at halda fólkapensjónsgrunduppheddina

skattafría. Hetta kemst av, at ásettu upphæddirnar eru gjørdar út frá einum fyridømi. har miðalskattaprosentið fyri føroyskar kommunur var umleið 15. Síðan broytingin varð gjørd, er miðalskattaprosentið í kommunuskatti komið upp ímóti 18% og verður tí mett, at neyðugt er, at tillaga frádráttarupphæddina soleiðis at grunduppheddin kann haldast uttan skatt í komunum við einum skattaprosenti upp til 18%. Broytingin verður sett í gildi sum galdandi fyri inntøkuárið 1993.

**Viðmerkingar til skattalógina:**

1) Broytingin í § 46 stk. 1 er ein broyting av verandi upphædd, sum er ásett sum "botnfrádráttur" í skattskyldugu inntøkuni, tá kommunuskattur verður roknaður. Broytingin umfatar eina broytingarætlan yvir 15 ár, og er fyri so vítt gildisfyriskipanarreglur. Men mett verður, at tá hetta eru so almennar og týðandi upphæddir, ið eru umfataðar av gildisreglunum, so er í hesum føri neyðugt at føra upphæddirnar við gildistíðarskeiði inn í sjálvan lógartekstin.

2) Ásetingin um frádráttarrætt fyri privatar rentuútreiðslur í kommunuskattinum verða her broyttar, so rentufrádrátturin frá teim núgaldandi 13 % verður líðandi lækkaður yvir 15 ár inntil frádráttur í 2009 er komin á 0% og harvið er fallin burtur.

3) Lækkingin vegna hámarkið í § 54, stk. 2 verður her avmarkað, so lækkingin ongantíð gerst størri enn lutfalsliga lækkingin við 20% í kommunuskatti. Harí liggur eisini, at tað ikki verður gjørd nøkur lækking fyri kommuskattaprosent, ið liggja omanfyri 20.

4) og 5) eru neyvari ásetingingar av teim galdandi reglum um hvussu eykaskattur verður roknaður samanborið við hámarkið og við fyribilsskattatrekkið.

**Viðmerkingar til ásetingarlógina:**

1) Broyting nr. 1) umfatar eina broyting av "botnfrádráttinum" í skattskyldugu inntøkunum, tá landsskattur verður útroknaður. Núverandi upphædd uppá 22.500 kr., verður í 1995 broytt til 23.700 kr. og vísandi til gildisreglurnar verður hendan upphædd líðandi hækkað í sama tíðarskeiði, sum rentufrádrátturin lækkar. Upphæddin ávirkar samstundis útrokningarnar í skattastiganum, sum allar taka útgangspunkt í botnfrádráttinum / 1. stig á skattastiganum.

2) og 3) Eru broytingarnar har frádrátturin hjá pensjónistum v.m. verður nakað hækkaður í mun til teir galdandi frádráttirnar.

4) Ller verður prosentsatsurin fyri privatan rentufrádrátt í landsskattinum lækkaður á tilsvarandi hátt, sum viðvíkjandi frádráttinum í kommunuskattinum, so at allur privatur frádráttarrættur fyri rentuútreiðslur er fallin burtur í ár 2009.

Broytingarnar viðvíkjandi hámarkinum sæð í mun til kommunuskattaprosentið er ætlað at koma í gildi 1. januar 1994, meðan broytingarnar í rentufrádrátti og botnfrádrátti koma í gildi 1. januar 1995. Hinar broytingarnar koma í gildi dagin eftir at lógin er kunngjørd.

## Felagsálit

## í

*løgtingsmáli nr. 125/1992: Broyting í løgtingslóg um kommunuskatt og løgtingsmáli nr. 126/1992: Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.*

Málini eru løgd fram av landsstýrinum tann 16. mars 1993 og eftir 1. viðgerð tann 24. mars 1993 beint í skattanevndina.
Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Av tí at nýskipaða landsstýrið hevur ynskt nærri at eftirkanna tingmál nr. 125/1992 og tingmál nr. 126/1992 setir meirilutin (Jacob Lindenskov, Heini O. Heinesen og Lasse Klein) einki álit fram, men í staðin setir meirilutin fram uppskot, um at punktini 2 og 3 í lógaruppskotinum nr. 126, tey viðvíkja frádráttinum í landsskattinum hjá pensjónistum v.m. (fólka-, avlamis- og framskunda pensjón), ið fáa ein hækkaðan frárátt, sum árliga er kr. 1.000 fyri stakar pensjónistar og kr. 1.500 fyri hjún, verða samtykt. Hækkingin fær gildi beinanvegin.

Meirilutin (Jacob Lindenskov, Heini O. Heinesen og Lasse Klein) setir tí fram soljóðandi:

**broytingaruppskot**

**til**

*uppskot landsstýrisins í tingmáli nr. 126/1992.*

1) Í § 1 ganga pkt. 1) og 4) út og pkt. 2) og 3) verða pkt. 1) og 2).
2) § 2 verður orðað soleiðis:
"Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Tó kemur upphæddin í § 1, pkt. 1) í 1993 at verða 6.050 kr. og upphæddin í § 1, pkt. 2) í 1993 at verða 9.050 kr."

1) I § 1 udgår pkt. 1) og 4) og pkt. 2) og 3) bliver herefter pkt. 1) og 2).
2) § 2 affattes således:
"Denne lagtingslov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen. Dog bliver beløbet i § 1, pkt. 1) i 1993 6.050 kr. og beløbet i §, 1 pkt. 2) i 1993 9.050 kr."

Minnilutin (Bjarni Djurholm) tekur undir við málunum og mælir tinginum til at samtykkja uppskotini.

Minnilutin (Finnbogi Arge) tekur støðu í tingsalinum.

# 126. Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan

**Uppskot**

**til**

*broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1, pkt. 2 verður orðað soleiðis:
Er inntøkan minni enn kr. 23.700 verður latið 0%

| Er inntøkan kr. | men minni enn kr. | verður latið kr. | av kr. | og av restini % |
|---|---|---|---|---|
| Er indtægten kr. | men mindre end kr. | erlægges kr. | af kr. | og af resten % |
| 23.700 | 60.000 | 0 | 23.700 | 15% |
| 60.000 | 140.000 | 5.445 | 60.000 | 31% |
| 140.000 | 220.000 | 30.245 | 140.000 | 36% |
| 220.000 | 300.000 | 59.045 | 220.000 | 39% |
| 300.000 | | 90.245 | 300.000 | 43% |

2) Í § 3, stk. 2 verður: "5.500 kr." broytt til "6.600 kr."
3) Í § 3, stk. 3 verður "8.300 kr." broytt til "9.800 kr."
4) Sum nýggj § 4 c verður sett:
Í § 4, stk. 1 og stk. 4 og § 4a, stk. 1, stk. 2 og stk. 3 verður "27%" broytt soleiðis:

*til ændring af lagtingslov om fastsættelse af skat til landskassen.*

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 87 af 1. september 1983 om fastsættelse af skat til landskassen med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 1, pkt. 2 affattes således:
Er indtægten mindre end kr. 23.700 erlægges 0%

2) I § 3, stk. 2 ændres: "5.500 kr." til "6.600 kr."
3) I § 3, stk. 3 ændres: "8.300 kr." til "9.800 kr."
4) Som ny § 4c indsættes:
I § 4, stk. 1 og stk. 4 og i § 4a, stk. 1, stk. 2 og stk. 3 ændres "27%" således:

í 1995 til "25,5 %"
í 1996 til "24,- %"
í 1997 til "22,5 %"
í 1998 til "21,- %"
í 1999 til "20,- %"
í 2000 til "18,- %"
í 2001 til "16,- %"
í 2002 til "14.- %"
í 2003 til "12,- %"
í 2004 til "10,- %"
í 2005 til "8,- %"
í 2006 til "6,- %"
í 2007 til "4,- %"
í 2008 til "2,- %"
í 2009 og framyvir til "0%".

§ 2.

Hendan løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Stk. 2.** Broyting nr. 1 kemur tó í gildi 1. januar 1995, og upphæddin uppá 23.700 kr. verður annars broytt soleiðis:

fyri 1996 til kr. 24.900
fyri 1997 til kr. 26.100
fyri 1998 til kr. 27.300
fyri 1999 til kr. 28.500
fyri 2000 til kr. 30.000
fyri 2001 til kr. 31.500
fyri 2002 til kr. 33.000
fyri 2003 til kr. 34.000
fyri 2004 til kr. 35.000
fyri 2005 til kr. 36.000
fyri 2006 til kr. 37.000
fyri 2007 til kr. 38.000
fyri 2008 til kr. 39.000
fyri 2009 og framyvir til kr. 40.000.

Samstundis, sum broytingarnar koma í gildi eftir pkt. 1, broytist samsvarandi

i 1995 til "25,5 %"
i 1996 til "24,- %"
i 1997 til "22,5 %"
i 1998 til "21,- %"
i 1999 til "20,- %"
i 2000 til "18,- %"
i 2001 til "16,- %"
i 2002 til "14,- %"
i 2003 til "12,- %"
i 2004 til "10,- %"
i 2005 til "8,- %"
i 2006 til "6,- %"
i 2007 til "4,- %"
i 2008 til "2,- %"
i 2009 og fremover til "0%".

§ 2.

Denne lagtingslov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

**Stk. 2.** Ændring nr. 1) træder dog i kraft 1. januar 1995, og beløbet på 23.700 kr. ændres ellers sålcdes:

for 1996 til kr. 24.900
for 1997 til kr. 26.100
for 1998 til kr. 27.300
for 1999 til kr. 28.500
for 2000 til kr. 30.000
for 2001 til kr. 31.500
for 2002 til kr. 33.000
for 2003 til kr. 34.000
for 2004 til kr. 35.000
for 2005 til kr. 36.000
for 2006 til kr. 37.000
for 2007 til kr. 38.000
for 2008 til kr. 39.000
for 2009 og fremover til kr. 40.000.

Samtidig, som ændringerne i pkt. 1 træder i kraft, ændres det tilsvarende

upphædd í skattastiganum og útrokningarnar fylgja hesi broyting.

**Stk. 3.** Broyting nr. 4 kemur í gildi 1. januar 1995.

beløb i skatteloven og udregningerne følger denne ændring.

**Stk. 3.** Ændring nr. 4 træder i kraft 1. januar 1995.

**Viðmerkingar:**

Víst verður til viðmerkingarnar í løgtingsmáli nr. 125/1992: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

## Felagsálit

í

*løgtingsmáli nr. 125/1992: Broyting í løgtingslóg um kommunuskatt og løgtingsmáli nr. 126/1992: Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.*

Málini eru løgd fram av landsstýrinum tann 16. mars 1993 og eftir 1. viðgerð tann 24. mars 1993 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Av tí at nýskipaða landsstýrið hevur ynskt nærri at eftirkanna tingmál nr. 125/1992 og tingmál nr. 126/1992 setir meirilutin (Jacob Lindenskov, Heini O. Heinesen og Lasse Klein) einki álit fram, men í staðin setir meirilutin fram uppskot um at punktini 2 og 3 í lógaruppskotinum nr. 126, tey viðvíkja frádráttinum í landsskattinum hjá pensjónistum v.m. (fólka-, alamis- og framskundað pensjón), ið fáa ein hækkaðan frádrátt, sum árliga er kr. 1.000 fyri stakar pensjónistar og kr. 1.500 fyri hjún, verða samtykt. Hækkingin fær gildi beinanvegin.

Meirilutin (Jacob Lindenskov, Heini O. Heinesen og Lasse Klein) setir tí fram soljóðandi:

## Broytingaruppskot

til

*uppskot landsstýrisins í tingmáli nr. 126/1992:*

1) Í § 1 ganga pkt. 1) og 4) út og pkt. 2) og 3) verða pkt. 1) og 2).
2) § 2 verður orðað soleiðis:
"Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd. Tó

1) I § 1 udgår pkt. 1) og 4) og pkt. 2) og 3) bliver herefter pkt. 1) og 2)
2) § 2 affattes således:
"Denne lagtingslov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen. Dog

kemur upphæddin í § 1 pkt. 1) í 1993 verða 6.050 kr. og upphæddin í § 1 pkt. 2) í 1993 at verða 9.050 kr."

bliver beløbet i § 1 pkt. 1) i 1993 6.050 kr. og beløbet i § 1 pkt. 2) i 1993 9.050 kr."

Minnilutin (Bjarni Djurholm) tekur undir við málunum og mælir tinginum til at samtykkja uppskotini.

Minnilutin (Finnbogi Arge) tekur støðu í tingsalinum.

# 127. Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald.*

*lagtingslov om ændring i lagtingslov om meromsætningsafgift.*

Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

I lagtingslov nr. 136 af 8. september 1992 om meromsætningsafgift med senere ændringer foretages disse ændringer:

**§ 1**

1) § 2, 1. stk., 2. pkt. verður orðað soleiðis: "Gass, ravmagn og hiti eru at rokna sum vørur. Vatn verður tó ikki at rokna sum vøra."
2) Í § 3, 3. stk. verður orðið "vatni" strikað.
3) Í § 12, 1. stk. litra j verður sum uppískoyti sett: ", og útflutningsfyritøkur ímillum. Sum útflutningsfyritøkur eru at skilja fyritøkur, hvørs søla beinleiðis ella óbeinleiðis í høvuðsheitum er til útlandið."

**§ 1**

1) § 2, stk. 1, 2. pkt. affattes således: "Gas, elektricitet og varme anses som varer, vand skal dog ikke anses som en vare."
2) I § 3, stk. 3. udgår ordet: "vand".
3) I § 12, stk. 1 litra j tilføjes: ", og eksportvirksomheder imellem. Som eksportvirksomheder anses virksomheder, hvis afsætning direkte eller indirekte overvejende sker til udlandet."

4) Í § 12, 1. stk. verður litra i strikað. § 12, 1. stk. litra j verður síðani broytt til litra i.

5) Í § 26 verður sett sum stk. 2:
"Føroya Gjaldstova fremur panting fyri meirvirðisgjald eftir stk. 1, eftir reglunum fyri innkrevjing av skattum.

6) Í § 27 verður sum nýtt 9. stk. sett:
"Innflutningur av fiski, skeljadýrum, lindýrum og øðrum ryggleysum vatndýrum (jbr. 3. kap. í toll- og vøruskránni) og innflutningur av iðnaðarfiski (jbr. vørunummar 05.11.91.91 - 05.11.91.99 í toll- og vøruskránni) til útflutningsfyritøkur, hvørs søla beinleiðis ella óbeinleiðis í høvuðsheitum er til útlond, kann fara fram, uttan at meirvirðisgjald skal rindast í sambandi við innflutningin."

7) Í § 36 verður sum nýtt 2. stk. sett:
"Landsstýrið kann áseta, í hvønn mun endurgjald kann veitast fyri avgjald, sum flutningsfyritøkur hava goldið í sambandi við uttanríkisfólkaflutning ella avgjald, ið er goldið í sambandi við banka-, fíggjar- og tryggingarvirksemi í londum uttan fyri Føroyar."

4) I § 12, stk. 1 udgår litra i. § 12, stk. 1 litra j ændres derefter til litra i.

5) I § 26 indsættes som stk. 2:
"Udpantning for merværdiafgift efter stk. 1 foretages af Føroya Gjaldstova efter reglerne for inddrivelse af skatter.

6) I § 27 indsættes som nyt stk. 9:
"Indførsel af fisk, krebsdyr, bløddyr og andre hvirvelløse vanddyr (jfr. kap. 3 i told- og varefortegnelsen) og indførsel af industrifisk (jfr. pos. 05.11.91.91 til 05.11.91.99 i told- og varefortegnelsen) til eksportvirksomheder, hvis afsætning direkte eller indirekte overvejende sker til udlandet, kan ske, uden at der skal svares afgift i forbindelse med indførslen."

7) I § 36 indsættes som nyt stk. 2:
"Landsstyret kan fastsætte, i hvilket omfang der kan ydes godtgørelse af afgift, som transportvirksomheder har betalt i forbindelse med udenrigspersonbefordring eller afgift, der er betalt i forbindelse med bank-, finansierings- samt forsikringsvirksomhed i lande uden for Færøerne."

§ 2

Hendа lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

**Viðmerkingar:**

Fyriliggjandi uppskot landsstýrisins um broytingar í løgtingslóg um meirvirðisgjald umfata broytingar, sum landsstýrið metir verða neyðugar fyri longu nú í byrjunarstøðinum í umsitingini av meirvirðisgjaldsskipanini at fáa hesa tillagaða

í mest møguligan mun til føroysk viðurskifti, har hesi nú í praksis sýna at víkja so munandi frá teimum fyritreytum, lógin er uppbygd eftir, at neyðugt er við broytingum.

**Viðvíkjandi vatnveiting:**

Í meirvirðisgjaldslógini er vatn nevnt sum vøra, ið er avgjaldsskyldug. Hetta merkir, at brúkarin eigur at rinda meirvirðisgjald upp á 23 % av tí vatnnýtslu. viðkomandi hevur.

Í Føroyum er meginreglan, at vatnveitingin í hvørjari kommunu sær er innroknað í ta samlaðu kommunufíggjarætlanina, og verður vatngjald kravt inn yvir skattin. Tað vil siga, at rokningin hjá hvørjum einkultum húsarhaldi fyri tað fyrsta ikki er frábýtt sum serskild rokning, og tí ei heldur máld út eftir vatnnýtsluni hjá tí einstaka húsarhaldinum. Hetta er øðrvísi enn vatnveitingarskipaninar í t.d. Danmark, har meginreglan er, at hvørt húsarhald fær serskilda rokning upp á vatn, útroknað eftir ymiskum skipanum frá kommunu til kommunu, men altíð við útgangsstøði í vatnnýtsluni hjá tí einkulta ella hjá kommununi samlað. Í Danmark er vatnmátari í nærum øllum húsunum, so tað er gjørligt at síggja, hvussu nógv hvørt einstakt húsarhald brúkar, og gevur tað tí ei heldur trupulleikar at áleggja meirvirðisgjald á hesa vøru.

Hetta kann eitt nú samanberast við, hvussu elbrúkið verður mált og innkravt í Føroyum.

Í Føroyum er mannagongdin øðrvísi, tí sum sagt, verður vatnið í flest øllum kommunum goldið í skattinum. Skal vatn í meirvirðisgjaldslógini verða mett sum vøra, ið er avgjaldsskyldug, so eru avleiðingarnar eitt nú, at kommunurnar skulu frábýta útreiðslurnar til vatnveiting frá skattinum, og krevja gjald og meirvirðisgjald fyri veiting av vatni eftir tí nýtslu, ið borgarin hevur. Harumframt gerst neyðugt, at vatnmátarar skulu setast inn í tey einstøku húsini, so fólk kunnu síggja, hvussu nógv tey hava brúkt og gjalda samsvarandi.

Landsstýrið metir ikki, at tíðin er til at gera slíkar broytingar í innkrevjingini av inntøkunum til kommunurnar, og skjýtur tí upp, at varðveita verandi vatnskipan og harvið at broyta lógina um meirvirðisgjald, so at vatn ikki longur verður at rokna sum ein avgjaldsskyldug vøra í meirvirðisgjaldslógini.

**Viðvíkjandi innflutningi av fiski:**

Tá lógin um meirvirðisgjald varð sett í gildi, var ætlanin at søla av fiski til útflutning ikki skuldi koma undir avgjaldsskyldu, meðan søla av fiski í vanligari detailsølu innanlands skuldi verða avgjaldsskyldug.

Ivi vísur seg nú at hava tikið seg upp, um avgjaldsfrítøkan fyri sølu av fiski til útflutning eisini umfatar innflutning av fiski og sølu til útflutnings, tá ið eitt virki sum millumlið tilvirkar fiskin innan útflutning.

Fyri at fáa heilt greiðar reglur fyri avgjaldsfrítøkuni á sølu, innflutningi, og útflutningi av fiski, mælir landsstýrið í hesum uppskoti tí til at gera ásetingarnar í greinunum 12 og 27 hesum viðvíkjandi meira neyvar.

Eins og beinleiðis søla av fiski til útflutning so verða útflutningsfyritøkur, sum handla sínámillum við fiski, sum skal til útflutning, hereftir ikki álagdar meirvirðisgjald í samhandlinum teirra millum.

**Vikubløð o.a.**

Sum lógin er orðað í dag í § 12, 1. stk., litra i, kunnu kioskir og bókhandlar umboða sølu av vikubløðum, uttan at meirvirðisgjald verður álagt, tí tað verður sett javnt við, at bløðini verða send beinleiðis frá distributørinum.

Landsstýrið metir, at tað bert skal verða beinleiðis hald av vikubløðum, ið brúkarin ikki skal rinda meirvirðisgjald av, t.e. bert har, ið brúkarans hald er hóttað soleiðis, at bløðini koma beinleiðis via post frá útlendska útgevaranum til haldaran, kunnu vikubløð innflytast uttan at rindast skal meirvirðisgjald av innflutninginum. Harvið er eisini sagt, at øll leysasøla av slíkum vikubløðum, ið fer fram í handlum og kioskum er vanlig søla og ikki hald, og at av vørusøluni skal rindast meirvirðisgjald.

**Uttanríkis fólkaflutningur**

Frá flutningsfyritøkum hevur verið víst á, at hvat meirvirðisgjaldi viðvíkur eru lógarreglurnar viðvíkjandi frádrátti fyri meirvirðisgjald ikki líka í Danmark og Føroyum.

Sum kunnugt, er meginparturin av søluni hjá flogfelagnum tólkaflutningur, og hesin er frítikin frá meirvirðisgjaldsskyldu. Flutningsfyritøkurnar hava tó eisini keyp og sølu av vørum/tænastum, ið er meirvirðisgjaldsskyldugt.

Eftir galdandi reglum kann føroyska flogfelagið sambært vanligu reglunum um lutfalsligan frádráttarrætt bert fáa eitt ógvuliga lágt meirvirðisendurgjald, nevniliga endurgjald av meirvirðisgjaldsskyldugu søluni, ..um til dømis kann vera frakt.

Í Danmark kunnu donsk flogfør eftir umsókn verða skrásett, og umframt at fáa meirvirðisendurgjald av meirvirðisgjaldsskyldugu søluni, eisini fáa frádráttarrætt fyri meirvirðisgjald av keypi og øðrum, sum viðvíkur uttanríkisfólkaflutningi við flogførum og skipum.

Ójavnin av hesum reglum kann vera ein kappingaravlaðing, við tað at donsk flutningsfeløg í slíkum førum hava betri treytir, hvat meirvirðisgjaldi viðvíkur, enn føroyska flogfelagið.

Tí verður mælt til, at vit á hesum øki fáa samsvar millum føroysku lógarásetingarnar og tær donsku reglurnar, og kann hetta gerast við sum nýtt stk. 2 í grein 36 at heimila landsstýrinum at áseta, í hvønn mun endurgjald kann veitast fyri

avgjald, sum flutningsfyritøkur hava goldið í sambandi við uttanríkisfólkaflutning.

**Viðmerkingar til tær einstøku broytingarnar:**

Broyting nr. 1) og nr. 2) eru broytingar í grein 2 og 3 av tí núgaldandi útleggingini av, hvat er at skilja við eina vøru, tá meirvirðisgjald skal gjaldast. Broytingin inniber, at vatn hereftir ikki skal roknast sum ein vøra, sum er umfatað av avgjaldsskylduni í lógini um meirvirðisgjald.

Broyting nr. 3) er ein nágreining av grein 12, har neyvari verður ásett, at meirvirðisgjald ikki skal áleggjast nøkrum søluliði í sølu av fiski, ið fer til útflutning, t.v.s. tað skal ei heldur rindast meirvirðisgjald av sølu av fiski í millumliðum, tá eitt møguligt millumlið er ein liður í eini tilvirkan av fiskavøru til útflutning.

Tey millumlið, hugsað verður um, eru fyritøkur, ið vanliga eru at meta sum útflutningsfyritøkur.

Broyting nr. 4) er ein broyting av reglunum í grein 12 viðvíkjandi vavinum av avgjaldsskyldugu søluni. Eftir verandi reglum skal ein, sum selur útlendsk tíðarrit, ikki rokna sølu av útlendskum tíðarritum í blaðhaldi til avgjaldsskyldugu søluna, tá haldaragjaldið er fingið í lag millum haldaran og útlendska útgevaran. Hendan regla verður nú strikað, so tað bert er beinleiðis hald, ið verður avgjaldsfrítt og ikki innanlands søla. Avgjaldsfrítøkan er tá í reglunum í grein 27 um innflutningsgjald.

Broyting nr. 5) er ein nágreining av pantiheimildini í § 26. Á síðu 6 í teimum almennu viðmerkingunum til lógina um meirvirðisgjald stendur, at Føroya Gjaldstova skal umsita eftirstøðurnar av meirvirðisgjaldinum.

Í viðmerkingunum til lógarinnar § 22 um meirvirðisgjald, ið ikki verður goldið rættstundis, verður sagt, at Føroya Gjaldstova kemur at umsita innkrevjingar av eftirstøðum sambært meirvirðisgjaldslógini.

Sambært § 26 í lógini kann meirvirðisgjald, ið er fallið til gjaldingar, krevjast inn við panting.

Í viðmerkingunum til § 26 verður sagt, at við hesum slepst undan at fara í Føroya Rætt og fáa grundalag fyri úttøku hvørja ferð meirvirðisgjald, ið er fallið til gjaldingar, ikki verður goldið.

Pantingar fyri krøv, ið sambært lóg kunnu innheintast við panting, ger fútarættarin, um ikki annað er ásett, antin í teirri lógini, ið ásetur, at kravið verður pantað ella í aðrari lóggávu, ið ásetur, hvørjir myndugleikar hava heimild at panta krøvini.

At gjaldstovan sambært viðmerkingunum skal umsita og innkrevja meirvirðiseftirstøðurnar heimilar ikki Føroya Gjaldstovu eisini at panta fyri meirvirðisgjald.

Av tí, at eingin innkrevjingarlóg er, ið generelt heimilar gjaldstovuni at panta krøv, ið sambært lóg kunnu krevjast inn við panting, og gjaldstovuni sostatt bert er heimilað at panta fyri skatt, verður skotið upp, at Føroya Gjaldstova eisini fær tí neyðugu heimild at panta fyri meirvirðisgjald.

Broyting nr. 6) er ein broyting av reglunum í grein 27 um avgjald av innflutningi úr útlondunum. Broytingin er ein fylgibroyting av broytingunum í grein 12 viðvíkjandi sølu av fiski til útflutning, so avgjaldsfrítøkan eisini umfatar innfluttan fisk, ið kemur til landið til tilvirkingar fyri síðan at verða útfluttur.

Í broyting nr. 7) verður heimilað landsstýrinum at gera serskipanir fyri endurrindan av avgjaldi til flutningsfeløg hvat viðvíkur uttanríkisfólkaflutningi.

**Viðmerkingar:**

**Viðvíkjandi brennioljuni:**

Hetta er ein neyvari løgfrøðilig útgreining. So at tað skal verða heilt greitt, at tað serliga avgjaldið á brenniolju ikki skal áleggjast meirvirðisgjald. Hetta hevur verið praktiserað, síðani meirvirðisgjaldsskipanin varð sett í gildi, og er í tráð við ætlanina í lógini, tá ið hon varð samtykt. (Sí viðmerkingar í lógini)

**Viðvíkjandi fiskireiðsskapi:**

Skattanevnd Føroya Løgtings, hevur fingið skriv frá Menningarstovuni, har teir vegna Føroya Íðnaðarfelag og vinnuna, ið selir útgerð og tænastur til fiskivinnuna, gera vart við avleiðingarnar í lógarbroytingini, har søla av fiski frá skipum til virki skulu haldast uttanfyri avgjaldsskylduga sølu.

Nú vísir tað seg, at vinnan hevur trupulleikar av hesum undantaki. Skip sleppa ikki at uppkrevja MVG fyri sølu av fiski, men skulu gjalda MVG av sínum innkeypi. Hetta gevur skipunum gjaldføristrupulleikar. Úrslitið av hesum er, at fleiri skip keypa útgerð og tænastur uttanlands, tí so sleppa tey undan at rinda MVG.

Hetta gevur vinnuni í Føroyum, sum selur útgerð og tænastur til fiskivinnuna, trupulleikar. Tað eru fleiri dømi um, at fyritøkur hava mist góðar bíleggingar av hesi orsøk.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 127/1992: Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 16. mars 1993 og eftir 1. viðgerð tann 24. mars 1993 beint í skattanevndina.

Uppskot landsstýrisins miðar eftir nú á byrjunarstigi av meirvirðisgjaldsskipaninni at fáa lógina tillagaða føroysk viðurskifti sum mest, har lógin í praksis víkur so munandi frá teimum fyritreytum, lógin er uppbygd eftir, at neyðugt er við broytingum.

*Uppskotið umfatar hesi fyribrygdi:*

1) Vatnveiting
2) Innflutingur av fiski
3) Vikubløð o.a.
4) Uttanlendis fólkaflutningur

1) **Vatn:** Vatn er at skilja sum vøra í meirvirðisgjaldslógini. Sostatt er vatnnýtsla gjaldsskyldug við 23%. Men tað er nú einki serliga genialt hugskot, og mælir landsstýrið tí til at broyta lógina. Við uppskotnu broytingini verður vatn ikki longur roknað sum avgjaldsskyldug vøra í meirvirðisgjaldslógini.
2) **Innflutningur av fiski:** Tað var ongantíð ætlanin, at søla av fiski til útflutnings skuldi verða avgjaldsskyldug, men bert smásøla av fiski innlendis.

At gera greiðar reglur fyri avgjaldsfrítøku við sølu av fiski til útflutnings, tá eitt virki sum millumlið tilvirkar fiskin áðrenn úflutning, mælir landsstýrið til at broyta ásetingarnar í §§ 12 og 27. Við uppskotnu broyting verða útflutningsfyritøkur, sum handla sínámillum við fiski, sum skal útflytast, ikki álagdar meirvirðisgjald í samhandlinum teirra millum.

3) **Vikubløð o. a.:** Sum er, kunnu kioskir og bókhandlar umboða sølu av vikubløðum, uttan at meirvirðisgjald verður kravt, tí tað verður sett javnt við, at bløðini verða send beinleiðis frá blaðsendaranum. Landsstýrið mælir til, at brúkarin ikki skal rinda meirvirðisgjald beinleiðis av haldi av vikubløðum. V.ø.o. har bløðini koma beinleiðis við postinum frá útlendska útgevaranum, skal meirvirðisgjald ikki rindast. Sostatt er leysasøla av vikubløðum í handlum og kioskum vanlig søla og ikki hald - meirvirðisgjald skal rindast.
4) **Uttanlendis fólkaflutningur:** Frádráttur fyri meirvirðisgjaldið er ikki hin sami í Danmark sum í Føroyum. Flutningsfyritøkur hava víst á hetta fyribrigdi. Meginparturin av søluni hjá flogfeløgum er fólkaflutningur, og hann er ikki meirvirðisgjaldsskyldugur, og hetta førir við sær, at eingin frádráttur er hesum viðvíkjandi. Men hesar flutningsfyritøkur hava eisini keyp og sølu av vørum/tænastum, ið er meirvirðisgjaldsskyldugt. Kappingaravlaðan stendst av hesum. Donsk flutningsfeløg hava her betri treytir enn føroysk.

Mælt verður til at fáa samsvar á hesum øki, og verður tí skotið upp nýtt stk. 2 sett í § 36, sum gevur landsstýrinum heimild til at áseta, hvussu endurgjald kann

veitast av avgjaldi, sum flutningsfyritøkur hava goldið í samband við uttanlendisfólkaflutning.

Nærri greindar viðmerkingar til tær einstøku broytingarnar eru í uppskoti landsstýrisins.

Undir nevndarviðgerðini er kannað nærri eftir teimum viðmerkingunum, sum vóru havdar frammi undir 1. viðgerð av uppskoti landsstýrisins, og eisini hevur nevndin havt fund við Toll- og Skattastovuna og landsstýrismannin, sum legði málið fram, Jógvan Sundstein. Nevndin hevur havt fund við P/F Bacalao, Aksel Hansen, stjóra, og Leiv Michelsen, rakstrarleiðara; hesir løgdu dent á, at lógarreglurnar verða broyttar soleiðis, at innfluttur fiskur til víðari virkingar og útflutnings sleppur undan avgjøldum í millumliðinum. Í hesum sambandi setir nevndin fram broytingaruppskot til løgtingslóg um toll - lóg nr. 121 frá 23. desember 1991.

Eisini hevur nevndin fingið skriv frá Menningarstovuni, dagfest 18. mars 1993, sum vegna Føroya Íðnaðarfelag ger vart við tær óhepnu avleiðingarnar av, at fiskur til víðari virkingar í Føroyum verður kravdur meirvirðisgjald, tá hann verður keyptur til virkingar. Eisini ger Menningarstovan vart við trupulleikarnar í samband við "neyðuga útgerð", sum verður latin til nýtslu umborð á flogførum og skipum og tænastur, sum verða gjørdar fyri flogfør og skip. Hesum viðvíkjandi vísir nevndin á, at umsitingin er varug við trupulleikarnar og fer at koma við uppskoti um greiðar reglur.

Tá lógin um meirvirðisgjald upprunaliga varð samtykt, varð eitt broytingaruppskot samtykt, sum setti bøkur gjaldleysar av meirvirðisskipanini. Av hesum stóðst avlaðandi avleiðing. Tey, sum fáa bøkur gjøgnum bókaklubba uttanífrá, verða kravd meirvirðisgjald + 30 kr. umloysisgjald. Henda skipan gevur postverki og tollvaldi stórt ómaksarbeiði, men samstundis gevur henda skipan postverkinum fíggjarligt bakkast, og tað kann ikki verða ætlanin. Nevndin mælir til, at landsstýrið ger greiðari reglur á hesum øki.

Aftaná, at meirvirðisgjaldsskipanin er komin í gildi, hava fleiri vinnurekandi, ið javnan hava negativa avgjaldsupphædd, gjørt vart við, at tað er eitt tíðarkevjandi arbeiði serliga hjá smáum í vinnurekandi at skula avrokna eina ferð um vikuna. Í Danmark er tað mest vanligt, at vinnurekandi, ið javnan hava negativa avgjaldsupphædd, avrokna einaferð um mánaðin. Tað eru bert heilt stór virki, ið brúka vikuavrokning. Tey vinnurekandi virki, sum hava skrásett seg fyri vikuavrokning, áðrenn henda lógarbroyting kemur í gildi, skulu hava møguleika at broyta til mánaðaravrokning, hóast broytingarreglurnar í § 20, 3. stk..

Nevndin mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins saman við teimum broytingaruppskotum, sum nevndin setir fram. Samsvarandi hesum verður sett fram soljóðandi:

**broytingaruppskot**

**til**

**uppskot landsstýrisins**

1) Sum nýtt punkt 5) verður sett: "Í § 20, 3. stk. verður 1. pkt. orðað soleiðis:
"Virki, ið javnan hava negativa avgjaldsupphædd, kunnu fáa loyvi at avrokna eina ferð um mánaðin ella eina ferð um vikuna."."

2) Punktini í uppskotinum 5), 6) og 7) verða 6), 7) og 8).

1) Som nyt punkt 5) sættes: "I § 20, stk. 3, affattes 1. pkt. således:
"Virksomheder, der jævnligt har negativt afgiftstilsvar, kan få tilladelse til at afregne en gang om måneden eller en gang om ugen."."

2) Punkterne i forslaget 5), 6) og 7) bliver 6), 7) og 8).

Harumframt setir nevndin fram soljóðandi:

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um toll.*

Í løgtingslóg nr. 121 frá 23. desember 1991 um toll verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 24, 2. stk. verður orðað soleiðis:
"Innflutningur av fiski, skeljadýrum, lindýrum og øðrum ryggleysum vatndýrum (jbr. 3. kap. í toll- og vøruskránni) og innflutningur av iðnaðarfiski (jbr. vørunummar 05.11.91.91 - 05.11.91.99 í toll- og vøruskránni) til útflutningsfyritøkur, hvørs søla beinleiðis ella óbeinleiðis í høvuðsheitum er til útlond, kann fara fram, uttan at tollur skal rindast í samband við innflutning. Eftir umsókn kann loyvast, at aðrar vørur, sum í høvuðsheitum

*lagtingslov om ændring i lagtingslov om told.*

I lagtingslov nr. 121 af 23. december 1991 om told foretages disse ændringer:

1) § 24, stk. 2 affattes således:
"Indførsel af fisk, krebsdyr, bløddyr og andre hvirvelløse vanddyr (jfr. kap. 3 i told- og varefortegnelsen) og indførsel af industrifisk (jfr. pos. 05.11.91.91. til 05.11.91.99 i told- og varefortegnelsen) til eksportvirksomheder, hvis afsætning direkte eller indirekte overvejende sker til udlandet, kan ske, uden at der skal svares told i forbindelse med indførslen. Efter anmodning kan tillades, at andre varer, som overvejende anvendes i eksport-

verða nýttar í útflutningsfyritøkum, hvørs søla beinleiðis ella í høvuðsheitum er til útlond, kann fara fram uttan, at tollur skal rindast í sambandi við innflutningin."

2) Í § 24 verður sum nýtt 3. stk. sett:
"Tollvaldinum verður heimilað at seta nærri reglur fyri eftirlitið við, at treytirnar í 2. stk. verða hildnar."

3) 2 stk. í § 24 verður til 4 stk.

**§ 2.**

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

virksomheder, hvis salg direkte eller indirekte sker til udlandet, kan ske uden, at told skal betales i forbindelse med indførslen."

2) Í § 24 indsættes som nyt stk. 3:
"Toldmyndighederne bemyndiges til at fastsætte nærmere regler for kontrollen med, at betingelserne i stk. 2 bliver overholdt."

3) Stk. 2 i § 24 bliver stk. 4.

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen

## Broytingaruppskot

## til

## 3. viðgerð

## í

*løgtingsmáli nr. 127/1992: Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 7, stk. 2 litra a, verður sum uppískoyti sett:
", tó ikki serligt avgjald á brenniolju, sambært løgtingslóg nr. 179 frá 18. desember 1992 um serligt avgjald á brenniolju."

2) Í § 12, stk. 1 verður sum nýtt litra k sett:
"fiskireiðskapur til skip sum eru yvir 20 GT, og tey sum eru undir 20 GT, ið hava "Veiðiloyvi A".

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 136 av 8. september 1992 om meromsætningsafgift foretages disse ændringer:

1) I § 7, stk. 2, litra a, tilføjes:
", dog ikke den særlige afgift på brændeolie, i henhold til lagtingslov nr. 179 af 18. desember 1992 om særlig afgift på brændselsolie".

2) I § 12, stk. 1 indsættes som nyt litra k:
"fiskeredskaber til skibe over 20 GT, og de skibe som er mindre end 20 GT, og har "Veiðiloyvi A".

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1993. Broytingin í punkt 2) fær tó gildi 1. juli 1993.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1993. Ændringen i punkt 2) træder dog i kraft 1. juli 1993.

**Viðmerkingar:**

**Viðvíkjandi brennioljuni:**

Hetta er ein neyvari løgfrøðilig útreining. So at tað skal verða heilt greitt, at tað serliga avgjaldið á brenniolju ikki skal áleggjast meirvirðisgjald. Hetta hevur verið praktiserað síðani meirvirðisgjaldsskipanin varð sett í gildi, og er í tráð við ætlanina í lógini, tá ið hon varð samtykt. (Sí viðmerkingar í lógini)

**Viðvíkjandi fiskireiðskapi:**

Skattanevnd Føroya Løgtings, hevur fingið skriv frá Menningarstovuni, har teir vegna Føroya Ídnaðarfelag og vinnuna, ið selir útgerð og tænastur til fiskivinnuna, gera vart við avleiðingarnar í lógarbroytingini, har søla av fiski frá skipum til virki skulu haldast uttanfyri avgjaldsskylduga sølu.

Nú vísir tað seg at vinnan hevur trupulleikar av hesum undantaki. Skip sleppa ikki at uppkrevja MVG fyri sølu av fiski, men skulu gjalda MVG av sínum innkeypi. Hetta gevur skipunum gjaldføristrupulleikar. Úrslitið av hesum er, at fleiri skip keypa útgerð og tænastur uttanlands, tí so sleppa tey undan at rinda MVG.

Hetta gevur vinnuni í Føroyum, sum selur útgerð og tænastur til fiskivinnuna trupulleikar, tað eru fleiri dømi um, at fyritøkur hava mist góðar bíleggingar av hesi orsøk.

## Broytingaruppskot

## til

*løgtingsmál nr. 127/1992: Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald.*

Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald verður gjørd henda broyting:

"§ 2, stk. 2 nýtt litra "o":

"Neyðsynjarvørur til matna, klædna og bústað"."

I lagtingslov nr. 136 fra 8. september 1992 om meromsætningsafgift foretages denne ændring:

"§ 2, stk. 2 nyt litra "o":

Nødvendighedsartikler til mad, tøj og bolig"."

**Viðmerkingar:**

Uppskotið verður sett fram sum fráboðað undir 1. viðgerð. Tað er neyðugt at lætta um hjá teimum, ið hava fleiri munnar at metta og kroppar at klæða, nú ið skotið er upp, at vit skulu hava hægsta meirvirðisgjald í heiminum. Nakrar vørur og tænastur sleppa longu undan meirvirðisgjaldi. Tí verður skotið upp, at hetta eisini kemur at galda fyri neyðsynjarvørur.

# 128. Yvirtøka av Færøernes Realkreditinstitut

## I

## Uppskot

## til

## samtyktar

Løgtingið samtykkir at yvirtaka "Færøernes Realkreditinstitut" sum føroyskt sermál.

## II

## Uppskot

## til

*løgtingslóg um broyting í lóg "om Færøernes Realkreditinstitut."*

**§ 1.**

Í lóg nr. 60 frá 12. mars 1955 "om Færøernes Realkreditinstitut" verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í §§ 3, 4, stk. 1, 6, stk. 1, 7, stk. 2 og stk. 4, 10, stk. 5 og stk. 6 og 19 verður "statsministeriet og" strikað.
2) Í § 4, stk. 1 verður "1 udpeges af statsministeriet, 1 af Færøernes

*lagtingslov om ændring i lov om Færøernes Realkreditinstitut."*

**§ 1.**

I lov nr. 60 af 12. marts 1955 om Færøernes Realkreditinstitut foretages følgende ændringer:

1) I §§ 3, 4. stk. 1, 6, stk. 1, 7, stk. 2 og stk. 4, 10, stk. 5 og stk. 6 og 19 udgår "statsministeriet og".
2) I § 4, stk. 1 ændres "1 udpeges af statsministeriet, 1 af Færøernes

Landsstyre og 1 af Danmarks Nationalbank" broytt til: "sum landsstýrið tilnevnir".

3) Í § 5, stk. 1 verður "10" broytt til: "8" og "2 udpeges af folketinget" gongur út.

4) § 8 verður strikað.

5) Í § 19 verður "to af henholdsvis statsministeriet og landsstyret antagne revisorer samt af" broytt til: "en af landsstyret udpeget revisor samt".

6) Í § 21, stk. 2 verður "statsministeriet" broytt til: "landsstýrið".

§ 2.

Landsstýrið ásetir, nær lógin kemur í gildi.

Landsstyre og 1 af Danmarks Nationalbank" til: "som landsstyret udpeger".

3) I § 5, stk. 1 ændres "10" til "8" og "2 udpeges af folketinget" udgår.

4) § 8 ophæves.

5) I § 19 ændres "to af henholdsvis statsministeriet og landsstyret antagne revisorer samt af" til: "en af landsstyret udpeget revisor samt".

6) I § 21, stk. 2 ændres "statsministeriet" til: "landsstyret".

§ 2.

Landsstyret fastsætter tidspunktet for lovens ikrafttræden.

**Viðmerkingar:**

Sum liður í avbureaukratiserings- og privatiseringsætlanunum hjá donsku stjórnini hevur ríkismálaráðið um ríkisumboðið heitt á Føroya Landsstýri um at taka stig til, at Føroya Realkreditstovnur verður yvirtikin sum semál sambært heimastýrislógini litra A, pkt. 15.

Landsstýrið hevur samtykt, at leggja fyri tingið uppskot til samtyktar um at yvirtaka "Færøernes Realkreditinstitut" og samsvarandi uppskot til broytingar í lóg um "Færøernes Realkreditinstitut".

Ríkismálaráðið og tjóðbankin hava yvir fyri landsstýrinum váttað, at yvirtøka ikki fer at broyta higartil galdandi skipan viðvíkjandi ríkisábyrgd fyri lánum við panti í fiskiførum ella tað, at tjóðbankin keypir obligatiónir stovnsins.

Høvuðsbroytingarnar, sum skotnar eru upp í lógini eru, at heimildir og skyldur ríkismálaráðsins, tjóðbankans og fólkatingsins verða strikaðar, og í staðin álagdar landsstýrinum einsamøllum.

Sambært § 4, stk. 1 í lógini um realkreditstovnin eru 3 limir í stýrinum; 1 valdur av ríkismálaráðnum, 1 av landsstýrinum og 1 av tjóðbankanum. Eftir broytingaruppskotinum verða nú allir valdir av landsstýrinum.

Við tí tætta atknýti í huga, sum tjóðbankin hevur havt og framvegis hevur til realkreditstovnin, heldur landsstýrið tað vera rættast, at landsstýrið velur tann eina av stýrislimunum eftir tilmæli frá tjóðbankanum.

Skotið verður upp, at fólkatingið ikki longur skal velja 2 limir í umsjónarráðið (rådgivende repræsentantskab), sostatt verða bara 8 limir í umsjónarráðnum (rådgivende repræsentantskab).

Landsstýrið hevur mett, at tað er nóg mikið, at roknskapurin verður grannskoðaður av tveimum grannskoðarum, har ein verður valdur av landsstýrinum og ein av stýrinum. Higartil hevur roknskapurin verið grannskoðaður av einum grannskoðara, valdur av ríkismálaráðnum, einum av landsstýrinum og einum av stýrinum.

Landsstýrið er av teirri áskoðan, at ríkismálaráðið eigur at fáa boð um samtyktina, og at dagurin verður settur í samráð við ríkismálaráðið.

Landsstýrið mælir løgtinginum til at samtykkja yvirtøkuna og broytingarnar í lógini um "Færøernes Realkreditinstitut".

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 128/1992: Yvirtøka av Færøernes Realkreditinstitut.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 16. mars 1993 og eftir 1. viðgerð tann 23. mars 1993 beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og setir ein samd nevnd fram soljóðandi:

## Uppskot

## til

## samtyktar

Rættarnevndin verður millumtinganevnd, ið viðger tingmálið um yvirtøku av Færøernes Realkreditinstitut.

# 129. Skipan millum Føroyar og Litavia um sínámillum fiskirættindi í 1993

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Vísandi til § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond góðkennir løgtingið hjáløgdu avtalu frá 15. februar 1993 millum Føroyar og Litavia um sínámillum fiskirættindi í 1993.

**Viðmerkingar:**

Fundarsemjan frá samráðingunum við Litavia er hjáløgd.

Samráðingarnar við Baltisku londini vóru heftar av, at TAC'ið fyri toskin í Eystursjónum er minkað við 60% og farið niður í 40.000 tons. Tíðskil var ógvuliga avmarkað, hvussu nógvan tosk tey kundu lata av teirra parti av kvotuni. Javnvág var funnin við laksi, sild og brislingi.

Út frá avtalunum við Estland og Lettland fyri 1993 og avtaluna við Litavia fyri 1992 varð uppskot um býti av kvotum í 1993 gjørt og samtykt av báðum pørtum um ársskiftið.

Undir samráðingunum bjóðaði litaviska sendinevndin meir tosk og stóra øking í sild og brislingi enn upprunaliga uppskotið, og tí varð teirra svartkjaftakvota økt úr 6.000 tonsum í 10.000 tons.

Føroyska sildakvotan er økt 1.800 tons, laksakvotan er økt 5 tons og nú inngongur brislingur við 3.000 tonsum.

Ein grein er um, at partarnir vilja virka fyri samstarvi millum vinnuna hjá báðum londunum.

Niðanfyri er yvirlit, ið vísir litavisku og føroysku kvoturnar í 1992 og 1993. Talið av fiskiloyvum er tað sama bæði árini.

*Litaviskar kvotur í føroyskum sjógvi (tons).*

| | **1992** | **1993** |
|---|---|---|
| Svartkjaftur | 6.000 | 10.000 |

*Føroyskar kvotur í litaviskum sjógvi (tons).*

| | 1992 | 1993 |
|---|---|---|
| Toskur | 500 | 380 |
| Laksur | 10 | 15 |
| Sild | 200 | 2.000 |
| Brislingur | 0 | 3.000 |

**Álit**

**í**

*løgtingsmáli nr. 129/1992: Skipan millum Føroyar og Litavia um sínámillum fiskirættindi í 1993.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 16. mars 1993 og eftir 1. viðgerð tann 25. mars 1993 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið.

Kjartan Hoydal, fiskivinnustjóri, hevur verið og greitt nevndini frá, at Litavisku myndugleikarnir hava sett veiðibann eftir toski frá 1. apríl til 31. august 1993, men søgdu einki um hetta, tá ið sáttmálin varð undirskrivaður av samráðingarnevndunum. Bannið sigst at vera orsakað av friðing í gýtingartíðini. Kjartan Hoydal sigur, at hetta tíðarskeiðið er valla gýtingartíð, og so vítt hann veit, eru heldur ikki gýtingarøkir í Litaviskum sjógvi. Tí hevur landsstýrið mótmælt hesi friðing. Litavisku myndugleikarnir hava stytt tíðina til at verða frá 1. apríl til 31. mai 1993. Landsstýrið hevur svarað, at um veiðubannið ikki verður skorið niður til at vera frá 1. apríl til 30. apríl, vil landsstýrið hava nýggjar samráðingar. Tað vil viðføra, at Litavisku skipini mugu steðga sínum fiskiskapi í føroyskum sjóøki. Nevndin tekur til eftirtektar, at landsstýrið mótmælir og vil samráðast av nýggjum.

Ein samd nevnd mælir til at samtykkja upprunaliga sáttmálauppskotið.

# 130. Søla burtur av fastogn landsstýrisins í Tórshavn

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um sølu av parti av fastogn landsstýrisins í Tórshavn.*

**§ 1.**

Landsstýrinum verður heimilað at selja uml. 560 m² burtur av Sanatoriutrøðni matr. nr. 1335, Tórshavn.

**§ 2.**

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

*lagtingslov om salg af del af landsstyrets faste ejendom i Tórshavn.*

**§ 1.**

Landsstyret bemyndiges til af "Sanatoriutrøðin", matr. nr. 1335, Tórshavn, at sælge ca. 560 m².

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

**Viðmerkingar:**

Í sambandi við øktu ferðsluna eftir Hvítanesvegnum, nú Kollafjarðartunnilin er tikin í nýtslu, skal landsverkfrøðingurin gera eina rundkoyring við Eystara Ringveg, Tórshavn.

Neyðugt lendi til hesa vegagerð verður at taka burturav trøðni matr. nr. 1333 a, Tórshavn.

Á ástaðarfundi er semja gjørd við eigaran av matr. nr. 1333 a, at hesin keypir uml. 560 m² av ódyrkaðari jørð burtur av grannatrøðni, Sanatoriutrøðni, matr. nr. 1335, sum er landsins ogn, at leggja afturat ogn síni.

Sum endurgjald fyri hesum letur eigarin neyðugt lendi til rundkoyringina. Matrikulstovan ger endaliga uppmáting, tá arbeiðið er liðugt.

**Álit**

**í**

*løgtingsmáli nr. 130/1992: Søla burtur av fastogn landsstýrisins í Tórshavn.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 16. mars 1992 og eftir 1. viðgerð tann 23. mars beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og mælir ein samd nevnd tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

# 131. Løgtingslóg um javnstøðu millum kvinnur og menn

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um Javnstøðu millum kvinnur og menn.*

*lagtingslov om ligestilling mellem kvinder og mænd.*

**1. partur**
**Endamál**

**§ 1.**

Henda lóg hevur til endamáls at beina burtur allan mismun vegna kyn.

**2. stk.** Tað stríðir kortini ikki móti hesi lóg, at tryggjað verður øðrum kyninum serlig rættindi, tá ið hesi ætlast at náa endamáli lógarinnar.

**3. stk.** Veitast skal kvinnum og monnum eins møguleikar til útbúgving, arbeiði, yrkisliga og mentanarliga menning.

**1. del**
**Formål**

**§ 1.**

Formålet med denne lov er at bortelimminere al forskelsbehandling på grund af køn.

**2. stk.** Det er dog ikke i strid med denne lov, at det ene køn sikres særlige rettigheder, når disse er at opfylde lovens formål.

**3. stk.** Mænd og kvinder skal have lige muligheder til uddannelse, arbejde, faglig og kulturel udvikling.

**2. partur**
**Meginreglan**

**§ 2.**

Ikki er loyvt - hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis - at gera mismun á fólki vegna kyni.

**2. del**
**Hovedreglen**

**§ 2.**

Det er ikke tilladt - hverken direkte eller indirekte - at diskriminere på grund af køn.

## Starvsseting o.a.

### § 3.

Tað er ikki loyvt arbeiðsgevara at gera mismun á løntakara vegna kyn. Hesin mismunur er bannaður í sambandi við t.d. starvsseting, uppsøgn, starvsmeting, lønarflokking, starvsflyting, starvsuppflyting, farloyvi, arbeiðsumstøður og framhjárættindi.

**2. stk.** Ikki er loyvt arbeiðsgevara at lýsa eftir fólki til arbeiðis, har tað á nakran hátt bendir á, at annað kynið hevur fyrimun. Heldur ikki er loyvt útbúgvingarstovnum at søkja eftir næmingum, har annað kynið hevur fyrimun. Í heilt serligum føri kann javnstøðunevndin geva undantaksloyvi.

**3. stk.** Verður løntakari uppsagdur ella á annan hátt fyri vanbýti, tí hann hevur gjørt rættindi galdandi sambært 1. stk., kann verða veitt honum eina samsýning, sum í mesta lagi svarar til løn í 20 vikur. Samsýningin verður at áseta eftir starvsaldri og umstøðunum annars.

## Eins løn.

### § 4.

Arbeiðsgevari skal veita kvinnum og monnum eins løn og ágóða annars fyri sama arbeiði. Hetta er eisini galdandi fyri arbeiði, ið verður mett at hava sama virði.

**2.stk.** Løntakari, ið ikki fær eins løn og/ella ágóða sambært 1. stk., skal hava útgoldið munin og/ella veitast sama ágóða.

## Ansættelser o.l.

### § 3.

Det er ikke tilladt arbejdsgiver at diskriminere lønmodtager på grund af køn. Denne diskrimination er forbudt i forbindelse med ansættelse, afskedigelse, stillingsvurdering, løntrin, stillingsrokering, forfremmelse, orlov, arbejdsforhold og privilegier.

**2. stk.** Det er ikke tilladt arbejdsgiver at avertere efter folk til arbejde, hvorved der på nogen måde indikeres, at det ene køn foretrækkes. Det er heller ikke tilladt uddannelsesinstitutioner at søge elever, hvorved det ene køn foretrækkes. I ganske særlige tilfælde kan ligestillings udvalget give dispensation.

**3. stk.** Bliver lønmodtager opsagt eller på anden måde forfordelt for at have gjort sine rettigheder gældende i.h.t. 1 stk., kan han få en ydelse, der højst svarer til løn i 20 uger. Ydelsen skal ansættes efter anciennitet og forholdene ellers.

## Lige løn

### § 4.

Arbejdsgiver skal give kvinder og mænd lige løn og andet udbytte for samme arbejde. Dette gælder også for arbejde, der anses at have lige værdi.

**2. stk.** Lønmodtager, der ikke får lige løn og/eller udbytte i.h.t. 1. stk. skal få udbetalt forskellen og/eller tildelt samme ydelse.

**3. stk.** Verður løntakari uppsagdur ella á annan hátt fyri vanbýti, tí hesin hevur kravt lønarmunin ella aðrar ágóðar sambært 1. stk., skal arbeiðsgevarin rinda honum eina samsýning, sum í mesta lagi svarar til løn í 20 vikur. Samsýningin verður annars at áseta eftir starvsaldri og umstøðunum annars.

## Eins yrkis- og menningarmøguleikar

### § 5.

Arbeiðsgevari, sum hevur bæði kvinnur og menn í arbeiði, skal geva teimum eins møguleikar til t.d. útbúgving, eykaútbúgving, umskúling, at fara á skeið ella á ein og hvønn hátt at luttaka í virksemi, ið gevur løntakarum økt starvsføri.

**2. stk.** Verður løntakari uppsagdur ella á annan hátt fyri vanbýti, tí hann hevur kravt rættindi sambært 1. stk., skal arbeiðsgevarin lata eina samsýning eftir somu reglum sum í § 4, 3.stk.

## 3. partur
## Foreldrafrávera

### § 6.

Løntakarar hava rætt til at verða burtur úr arbeiði í sambandi við viðgongu, barnsburð og eftir barnsburð sambært galdandi lóg og/ella sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag/persón og arbeiðsgevara.

**2. stk.** Somu reglur eru galdandi í sambandi við ættleiðing.

**3. stk.** Bliver lønmodtager opsagt eller på anden måde forfordelt for at have gjort sine rettigheder gældende i.h.t. 1 stk. skal arbejdsgiveren udbetale ham en erstatning, der højst svarer til løn i 20 uger. Erstatningen skal ellers ansættes efter anciennitet og andre forhold.

## Lige arbejds- og udviklingsmuligheder

### § 5.

Arbejdsgiver, der både har kvinder og mænd i arbejde, skal give dem lige muligheder til f. eks. uddannelse, ekstrauddannelse, omskoling, kursusdeltagelse eller på enhver anden måde at deltage i aktiviteter, der giver lønmodtagere bedre arbejdsmuligheder.

**2. stk.** Bliver lønmodtager opsagt eller på anden måde forfordelt for at have gjort sine rettigheder gældende i.h.t. 1. stk., skal arbejdsgiveren yde erstatning efter samme regler som i § 4, 3. stk.

## 3. del
## Forælderorlov

### § 6.

Lønmodtagere har ret til fravær fra arbejde i forbindelse med graviditet, barsel og efter barsel i.h.t. gældende lov og/eller overenskomst mellem pågældende fagforening/person og arbejdsgiver.

**Stk. 2.** Samme regler er gældende i forbindelse med adoption.

**3. stk.** Løntakari, ið nýtt hevur rættindi sambært 1. og 2., kann ikki skerjast í lønar- ella eftirlønaraldri.

**4. stk.** Verður løntakari uppsagdur ella fyri vanbýti í móti reglunum í 1. og 2. stk., skal arbeiðsgevarin rinda eina samsýning, sum í mesta lagi svarar til løn í 50 vikur, ið verður at áseta alt eftir starvsaldri og umstøðunum annars.

**5. stk.** Verður løntakari uppsagdur ella á annan hátt fyri vanbýti í viðgongutíðini, undir barnsburði, eftir barnsburð ella ættleiðing, áliggur tað arbeiðsgevaranum at prógva, at uppsøgnin ikki var grundað á hesi viðurskifti.

**3. stk.** Lønmodtager, der har anvendt sine rettigheder i.h.t. 1. og 2. kan ikke nedsættes i anciennitet eller pension.

**4. stk.** Bliver lønmodtager opsagt eller forfordelt mod reglerne i 1. og 2. stk. skal arbejdsgiveren betale en erstatning, der højst svarer til løn i 50 uger, som skal ansættes efter anciennitet og forholdene ellers.

**5. stk.** Bliver lønmodtager opsagt eller på anden måde forfordelt under graviditet, ved barsel, efter barsel eller adoption, påhviler det arbejdsgiveren at bevise, at opsigelsen ikke var forårsaget af disse forhold.

## 4. partur
## Frálærntilfar

### § 7.

Frálæruttilfar til undirvísing og uppaling barna skal samsvara javnstøðuhugsjónini í hesi lóg.

**2. stk.** Øll lestrar- og starvsfrálæra skal leggjast soleiðis til rættis, at bæði kynini hava eins góðan møguleika at velja millum tey tilboð, undirvísingarstovnurin veitir.

## 4. del
## Undervisningsmateriale

### § 7.

Materiale til undervisning og børneopdragelse skal være i overensstemmelse med ligestillingstanken i denne lov.

**2. stk.** Alt læse- og arbejdsmateriale skal tilrettelægges således, at begge køn har lige muligheder at vælge mellem de tilbud, undervisningsinstitutionen giver.

## 5. partur
## Nevndir og ráð

### § 8.

Allar almennar nevndir, ráð, umboð og líknandi, sum fyrisitingarvaldið útnevnir, skulu verða sett saman soleiðis, at umleið eins nógvir limir av báðum kynum eru umboðað. Sama er galdandi

## 5. del
## Udvalg og råd

### § 8.

Alle offentlige udvalg, råd, repræsentationer eller lignende, som forvaltningen udnævner skal være af en sådan sammensætning, at omtrent lige mange medlemmer af begge køn er repræsen-

fyri tær nevndir, ráð, umboð og líknandi, sum løgtingið og bý- og bygdaráðini útnevna, tá ið tey, ið útnevnast skulu, ikki nýtast at vera løgtings- ella bý/bygdaráðslimir.

**2. stk.** Um privat feløg eiga rættindini at skjóta upp lim ella limir í almennar nevndir, ráð ella líknandi, skulu hesi altíð skjóta upp bæði mann og kvinnu. Hetta er eisini galdandi fyri sjálvognarstovnar o.l., tá ið tað almenna rindar meginpartin av rakstrinum.

**3. stk.** Tá ið serligar grundir eru fyri tí, kann javnstøðunevndin geva undantaksloyvi í hvørjum einstøkum føri ella fyri eina yrkisgrein sær.

teret. Det samme er gældende for de udvalg, råd, repræsentationer og lignende, som lagtinget og by- og bygderådene udnævner, når de, der skal udnævnes, ikke behøver at være lagtings- eller by/bygderådsmedlemmer.

**2. stk.** Hvis private selskaber har ret til at foreslå medlem eller medlemmer til offentlige udvalg, råd eller lignende, skal disse altid foreslå både mand og kvinde. Dette er også gældende for selvejerinstitutioner o.l., hvor det offentlige betaler størstedelen af driftsudgifterne.

**3. stk.** Når særlige grunde taler herfor, kan ligestillingsudvalget give dispensation i hvert enkelt tilfælde eller for et enkelt fagområde.

## 6. partur
## Javnstøðunevndin

## 6. del
## Ligestillingsudvalget

### § 9.

Javnstøðunevndin virkar undir Føroya Landsstýri. Umframt tær uppgávur, nevndar eru í hesi lóg, er virksemi nevndarinnar hetta:

1. at hava eftirlit við, at henda lóg verður hildin,
2. at vera ráðgevi hjá myndugleikum, stovnum, feløgum og einstaklingum í javnstøðuspurningum.
3. at geva tilmæli í javnstøðumálum.

### § 9.

Ligestillingsudvalget arbejder under Færøernes landsstyre. Foruden de opgaver, der er nævnt i denne lov, er udvalgets arbejde dette:

1. at kontrollere, at denne lov overholdes,
2. at være rådgivende for myndigheder, institutioner, selskaber og enkeltpersoner i ligestillingsspørgsmål.
3. at gøre indstillinger i ligestillingsspørgsmål.

### § 10.

Javnstøðunevndin hevur 5 limir, sum eftir tilmæli frá niðanfyri nevndu feløgum og stovnum verða tilnevndir av

### § 10.

Ligestillingsudvalget har 5 medlemmer, der efter indstilling fra nedenfor nævnte foreninger og institutioner, ud-

landsstýrinum: 1 umboðandi løntakarar, 1 umboðandi arbeiðsgevarar, 1 umboðandi Kvinnufelagssamskipan Føroya, 1 umboðandi skúla-, heilsu- og almennaverkið og 1 umboðandi Føroya Landsstýri. Umboð landsstýrisins er formaður.

**2. stk.** Tiltaksumboð verða vald á sama hátt sum umboð eftir 1. stk.

**3. stk.** Javnstøðunevndin verður vald beint eftir løgtingsval fyri valskeiðið, løgtingið situr. Umboð kunnu veljast aftur.

**4. stk.** Javnstøðunevndin kann útvega sær fyrisitingarliga hjálp at greiða tær uppgávur, lógin áleggur henni.

nævnes af landsstyret: 1 repræsenterende lønmodtagere, 1 repræsenterende arbejdsgivere, 1 repræsenterende færøske kvindeforeninger, 1 repræsenterende skole-, sundheds- og socialvæsenet og 1 repræsenterende Færøernes landsstyre. Landsstyrets repræsentant er formand.

**2. stk.** Suppleanter vælges på samme måde som repræsentanter efter 1. stk.

**3. stk.** Ligestillingsudvalget vælges lige efter lagtingsvalg for den periode, lagtinget vælges. Repræsentanter kan genvælges.

**4. stk.** Ligestillingsudvalget kan anskaffe sig administrativ assistance at udføre de opgaver, der pålægges det efter loven.

## § 11.

Fólk, sum halda seg hava verið fyri mismuni vegna kyn, kunnu kæra til javnstøðunevndina.

**2. stk.** Fær javnstøðunevndin grund at halda, at mismunur vegna kyn fer fram, kann nevndin taka málið upp.

**3. stk.** Um mál viðvíkjandi almennum myndugleikum og stovnum verður lagt fyri javnstøðunevndina, ella nevndin sjálv tekur málið upp, hevur myndugleikin ella stovnurin skyldu til at veita allar neyðugar upplýsingar.

**4. stk.** Yrkisfeløg og privatir arbeiðsgevarar hava eins og í 3. stk. skyldu at lata javnstøðunevndini allar upplýsingar, sum javnstøðunevndin metir neyðugar til tess at upplýsa málið.

## § 11.

Personer, der mener sig diskrimineret på grund af køn, kan klage til ligestillingsudvalget.

**2. stk.** Dersom ligestillingsudvalget får begrundet mistanke om, at kønsdiskrimination finder sted, kan udvalget tage spørgsmålet til behandling.

**3. stk.** Dersom spørgsmål vedrørende offentlige myndigheder og institutioner rejses overfor ligestillingsudvalget, eller dersom udvalget selv rejser et spørgsmål, har myndighederne eller institutionen pligt til at give alle nødvendige oplysninger.

**4. stk.** Fagforeninger og private arbejdsgivere har i lighed med 3. stk. pligt til at give ligestillingsudvalget alle oplysninger, som ligestillingsudvalget anser nødvendige for at undersøge spørgsmålet.

**5. stk.** Heldur javnstøðunevndin, at ein almennur stovnur, einstaklingur, felag, virki ella líknandi hevur brotið hesa lóg, skal nevndin innan 14 dagar, eftir at málið er liðugt viðgjørt av nevndini, senda áheitan til avvarðandi um at fáa lógarbrotið rættað innan 2 vikur.

**6. stk.** Landsstýrið ásetir nærri reglur um málsviðgerð.

**5. stk.** Hvis ligestillingsudvalget mener, at en offentlig myndighed, enkeltperson, selskab, foretagende eller lign. har brudt denne lov, skal udvalget inden 14 dage efter at spørgsmålet er færdigbehandlet i udvalget, anmode vedkommende at rette lovbruddet inden 2 uger.

**6. stk.** Landsstyret fastsætter nærmere regler for sagsbehandling.

## 7. partur
## Revsing og rættarviðgerð

### § 12.

Um javnstøðunevndin heldur, at farið er fram á ein hátt, sum er í stríð við lógina, og áheitan sambært § 11, 5. stk., ikki hevur havt nøktandi bata við sær, kann javnstøðunevndin

1) heita á ákæruvaldið um at reisa ákæru,
2) mæla til, at tann, hvørs rættindi eru brotin, fær fría rættargongd til rættarmál um samsýning.
3) leggja málið fyri rættin í borgarligari rættargangssókn um, at framferðarhátturin hevur verið í stríð við lógina,
4) tá ið talan er um almennan myndugleika ella stovn, at heita á viðkomandi yvirskipaða stovn um at áleggja viðkomandi myndugleika ella stovni at broyta avgerð ella framferðarhátt. Hjálpir hetta ikki, skal farast fram sambært nr. 1-3.

## 7. del
## Straf og retsbehandling

### § 12.

Dersom ligestillingsudvalget mener, at der er handlet i strid med loven, og anmodning i.h.t. § 11, 5. stk. ikke har medført tilfredsstillende bedring, kan ligestillingsudvalget

1) bede anklagemyndigheden om at rejse tiltale,
2) anbefale, at den hvis rettigheder er overtrådt, får fri proces til søgsmål om erstatning,
3) forelægge sagen for retten i borgerlig retsbehandling om, at fremgangsmåden er i strid med loven,
4) når det drejer sig om offentlige myndigheder eller institutioner, at anmode vedkommendes overordnede myndighed at pålægge vedkommende myndighed eller institution at ændre beslutning eller fremgangsmåde. Om dette ikke hjælper, skal handles i.h.t. nr. 1-3.

§ 13.

Allir sáttmálar, sum geva løntakarum verri sømdir ella rættindi, enn henda lóg gevur, eru í fullum líki ella lutvíst ógyldugir.

§ 14.

Brot á § 3, § 4, § 5, § 6, § 8, 11, og § 13 í hesi lóg verða revsað við sekt, eisini um hetta verður kravt í sambandi við borgarligari rættarsókn.

**2. stk.** Er lógarbrotið framt av partafelag, lutafelag, stovni, stati, landi, kommunu ella líknandi, kann sektarábyrgdin áleggjast felagnum e.ø. sjálvum.

§ 15.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 13.

Alle overenskomster, der giver lønmodtagere værre forhold eller rettigheder end denne lov giver, er helt eller delvis ugyldige.

§ 14.

Brud på § 3, § 4, § 5, § 6, § 8, 11 og § 13 i denne lov straffes med bøde, også om dette kræves i forbindelse med borgerlig rettergang.

**2. stk.** Er lovbruddet begået af aktieselskab, andelsselskab, institution, staten, landet, kommune eller lign., kan bødeforpligtelse ikendes selve selskabet e.a.

§ 15.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

## Viðmerkingar til Javnstøðulógina

### Alment um javnstøðustrembanina

Síðan einaveldini í Europa fullu, og londini fóru at skipa síni politisku viðurskifti á hugsjónina um fólkaræði, hava somu lond verið í støðugari menning til tess at seta í verk tær hugsjónir, sum longu vórðu grundlagdar í 18. øld. Hesar hugsjónir hava m.a. verið og eru at geva øllum menniskjum somu rættindi uttan mun til stætt, húðalit, kyn, politiska ella átrúnaðarliga sannføring o.s.fr.

Á hesum sama hugsjónarliga grundarlagi fingu kvinnur í nógvum londum atkvøðurætt og valbari serliga eftir 1. heimsbardaga. Hóast hesi rættindi ikki vórðu gjøgnumførd uttan vørr, so tykist vanliga hugsanin í dag at vera, at javnstøða á politiska økinum eru sjálvsøgd og náttúruborin rættindi.

Í dag ber til at staðfesta, at eingin formligur mismunur er millum menn og kvinnur, t.v.s javnrættindi. Kortini eru bæði leikur og lærdur samd um, at enn er langt á mál, soleiðis at tað í roynd og veru eisini gerst javnstøða og ikki bert javnrættindi.

Til tess at skunda undir ta menning at fremja javnrættindi í verki hava nógv lond viðtikið og sett í verk lógir, ið tryggja kvinnuni javnstøðu.

Hetta javnstøðulógarverk hevur formað seg eitt sindur ymisliga:

Stundum hevur byrjanin verið varlig, soleiðis at fyrsta lógin á hesum øki hevur snúð seg um t.d. eins løn fyri sama arbeiði; seinni hevur lóg um, at kynini skulu viðgerast eins á arbeiðsmarknaðinum - ella at eins nógvar kvinnur og menn skulu útnevnast í almennar nevndir og ráð.

Onnur lond hava hinvegin viðtikið lógir, sum hava øll hesi viðurskifti við.

Dømi um tílíkt lógarverk eru Noreg (1979) og Ísland (1976).

Danmark hevur viðtikið sínar lógir so við og við (fyrstu ferð 1976), og er hetta gjørt við beinleiðis ella óbeinleiðis trýsti frá EF, ið hevur fastar reglur at ganga eftir, og sum limalondini noyðast at fylgja.

Í Føroyum eru ongar lógarreglur, ið stimbra javnstøðu, uttan "Lov om lige adgang for Kvinder og Mænd til Tjenestestillinger og Hverv" (nr. 100 frá 4. mars 1921), sum varð sett í gildi í Føroyum 7. mai 1921. Henda lóg hevur ikki havt nakra ávirkan í Føroyum.

Tá ið lógaruppskot um javnstøðu í 1988 varð lagt fyri løgtingið, varð tað í viðmerkingunum sipað til ST-sáttmálan frá 18. dec. 1979 um avtøku av øllum hættum av mismuni móti kvinnum. Lógaruppskotið fall sum kunnugt á løgtingi, og tykist grundgevingin at hava verið, at javnrættindi vóru kynjanna millum, soleiðis at SI- sáttmálin í roynd og veru var gingin á møti. Grundað á einum løgfrøðiligum sjónarmiði er ST-sáttmálin frá 1979 (lýstur at galda í Føroyum 11. juni 1987) ikki gingin á møti ella á nakran hátt aktaður við at staðfesta formlig javnrættindi millum kynini. ST-sáttmálin er júst ein roynd at fáa londini at gjøgnumføra javnstøðu í øllum lutum og ikki bert formlig javnrættindi, tí tað er ein søgulig sannroynd, at formlig javnrættindi ikki viðføra javnstøðu innan fyri eitt rímiligt tíðarskeið. Í samsvari við ST-sáttmálan frá 18. dec. 1979 um avtøku av øllum hættum av mismuni móti kvinnum verður tískil sett fram hetta lógaruppskot um javnstøðu millum kynini:

**ad § 1.**

Endamál lógarinnar er at beina burtur allan mismun vegna kyn, soleiðis at kvinnur og menn fáa eins møguleikar á øllum økjum samfelagsins. Serligur dentur verður lagdur á møguleikamar viðvíkjandi útbúgving, arbeiði, yrkisliga og mentunarliga menning.

§ 1 eigur at takast við, tá ið ivi kann standast av øðrum greinum í lógini, soleiðis at ivi kann tulkast burtur við hjálp av hesi grein.

Í 2. stk. verður heimilað at gera undantøk, soleiðis at støðan hjá øðrum kyninum verður styrkt (positiv diskrimination). Hugsað verður um samfelagsøki, ið av søguligum ella vanabundnum orsøkum bert ella í høvuðsheitum hava knýtt annað kynið at sær. Hugsast kann t.d., at ein undirvísingarstovnur í eitt ávíst tíðarskeið setir hægri kvotering í gildi fyri tað kynið, sum stovnurin fegin vil

hava at søkja. Hesin mismunur má ikki setast í gildi uttan loyvi frá javnstøðunevndini, sí § 3, 2. stk. Í 3. stk. verður dentur lagdur á tey viðurskifti, ið vanliga sigast verða avgerandi fyri javnstøðu millum kynini. Fyrst verður nevnt møguleikin fyri útbúgving. Her verður hugsað um bæði bókliga og yrkisliga útbúgving - bæði innan tað almenna og privata. T.d. eiga reglurnar um studning og lán til lesandi og lærutíð annars at laga seg eftir teimum serligu viðurskiftunum, sum eru í sambandi við barnsburð.

**ad § 2.**

Meginreglan verður, at mismunur ikki má gerast hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis.

Beinleiðis kynsmismunur merkir, at kynið hevur verið avgerandi og ikki dygdir hins einstaka. Tað hevur ongan týdning, um t.d. ein arbeiðsgevari viðgongur hesi viðurskifti ella ikki. Spurningurin verður bert, um atburðurin fremur kynsmismun. Óbeinleiðis kynsmismunur merkir, at annað kynið verður verri fyri - ikki tí tað var ætlað soleiðis, men at úrslitið gjørdist mismunur orsakað av atburðinum. Her skal knýtast uppí, at ikki allur tílíkur atburður verður raktur av hesi lóg. Um t.d. ein arbeiðsgevari kann prógva, at grundarlagið undir atburðinum er grundað á almenn viðurskifti hjá viðkomandi virki, stovni o.s.fr., so verður hetta ikki mett sum lógarbrot. Tá ið tað snýr seg um beinleiðis og óbeinleiðis kynsmismun, er ikki ætlað at skapa nakað serligt føroyskt rættarfyribrigdi á hesum øki, men beinleiðis at fylgja tí rættarstøðu, soleiðis sum hon er komin og kemur til sjóndar á europeiska meginlandinum. Meginreglan verður sostatt, at eingin má vigast ella metast ella verða skorin yvir ein kamb vegna kyn, heldur skal hvør einstakur metast út frá egnum fortreytum so sum royndir, útbúgving, persónligar eginleikar o. a.

**ad § 3.**

Henda greinin fevnir um arbeiðsmarknaðin allan, t.v.s bæði tann almenna og privata arbeiðsgevaran. Kynsmismunur er bannaður ikki bert í teimum í hesi grein nevndu viðurskiftum, men eisini í viðurskiftum, ið á ein ella annan hátt nema við starvstreytir o.a. hjá løntakarunum.

Í 2. stk. verður bannað øllum arbeiðsgevarum at lýsa eftir bert øðrum kyninum. Lýsingarnar eiga at vera soleiðis orðaðar, at eingin heldur seg aftur at søkja vegna kyn sítt. Lýst eigur t.d. ikki at verða eftir flakakvinnum, men flakafólki; og ikki eftir skrivstovukvinnu, men eftir skrivstovufólki. Bert í heilt einstøkum førum kunnu lýsingar verða soleiðis orðaðar, at starvsheitið fær eftirskoyti - maður ella -kvinna, men bert tá ið hetta er til stóran ampa fyri gamlari málsligari siðvenju ella einki frægari orð kann finnast. Um so verður, eigur í somu lýsing at verða tilskilað, at tað snýr seg um bæði kynini.

Í 3. stk. kann løntakari - eisini tá ið tað snýr seg um arbeiði, sum ikki er lýst almennt - og hann/hon ikki hevur fingið arbeiðið og illgruni er um, at kynið hevur verið avgerandi - krevja skrivliga frágreiðing frá arbeiðsgevaranum, har hesin skal upplýsa tær dygdir o.a., sum hava verið grundarlagið undir starvssetaninni hjá tí setta. Tað ber kortini ikki til at nýta hesa heimild til tess at fáa upplýst onnur viðurskifti, enn tey, sum hava beinleiðis við illgruna um kynsmismun. Sambært 4. stk. kann løntakari, sum ger síni rættindi galdandi eftir 1. stk., og av hesi orsøk verður uppsagdur ella í aðrar mátar fyri vanbýti, krevja endurgjald, sum í mesta lagi kann svara til løn í 39 vikur. Løntakarar, ið eiga uppsagnarløn, eiga hesa umframt nevnda endurgjald.

**ad § 4.**

Við hesi grein er ikki ætlað at broyta ta lønarskipan, ið er á arbeiðsmarknaðinum, men at tryggja, at kvinnur og menn ikki fáa ólíka løn fyri sama arbeiði ella arbeiði, ið verður mett at hava sama virði. Tað veldur neyvan nakrar trupulleikar, tá ið júst sama arbeiði verður gjørt. Torførari kann verða at staðfesta, nær talan er um arbeiði, ið verður mett at hava sama virði. Vegleiðandi er, tá ið einki serligt krevst av øðrum til tess at røkja arbeiðsuppgávurnar hjá hinum kyninum. Á hendan hátt kann arbeiði, ið vanliga ikki verður hildið at verða tað sama, kortini vera tað sama sambært hesi grein. Samanbering av arbeiði kann eisini gerast tvørtur um arbeiðspláss, tá ið talan er um sama arbeiðsgevara (landið ella dóttur-feløg/móðurfeløg).

Løn sambært hesi grein snýr seg um allar ágóðar ella fyrimunir, ið stava frá arbeiðinum. Hesir ágóðar kunnu vera fríur bilur, frí telefon, ískoyti av ymsum slagi, eftirlønargjald, ella um munurin stavar frá einari avtalaðari akkordskipan.

Eftir 2. stk. kann løntakari, ið soleiðis verður fyri vanbýti viðvíkjandi løn, krevja munin. Hetta uttan mun til sáttmála millum viðkomandi yrkisfelag og arbeiðsgevara. 3. stk. svarar til § 3, 4.stk.

**ad § 5.**

Greinin skal tryggja, at eingin kynsmismunur verður gjørdur í sambandi við útbúgving/læru, eykaútbúgving, umskúling, at fara á skeið ella á einhvønn hátt at luttaka í virksemi, ið gevur løntakarum økt starvsføri, antin hetta viðførir hægri løn í sama starvi ella flyting í annað starv.

Í 2. stk. kann løntakari krevja endurgjald eftir somu reglum sum í § 4, 3. stk., um so er, at løntakarin verður uppsagdur ella á annan hátt verður fyri vanbýti, orsakað av at hann/hon kravdi síni rættindi sambært 1. stk. Møgulig uppsagnarløn eigur ikki at ávirka endurgjaldsupphæddina.

**ad § 6.**

Ætlanin við hesi grein er at tryggja løntakarunum í sambandi við barnsburð (fyri, undir og eftir), soleiðis at løntakarin ikki lættliga kann sigast upp, tí hesin hevur kravt tey rættindi, sum galdandi lóg ella sáttmáli ásetir. Galdandi lóg verður í hesum sambandi sipað til "Lov for Færøerne om dagpenge ved sygdom eller fødsel", nr. 644 frá 13. dec. 1978 við seinni broytingum, umframt løgtingslóg nr. 25 frá 30. apríl 1987 um dagpening í sambandi við barnsburð og sjúku. Løgtingslógin er seinni broytt 2. okt. 1987 og 12. juni 1990.

Rættindini verða kallað foreldrafrávera, tí at henda grein fevnir eisini um faðirin, soleiðis sum tilskilað er bæði í lóg og flestu sáttmálum á arbeiðsmarknaðinum.

Í 4. stk. verður ásett, at verður løntakari uppsagdur ella á annan hátt fyri vanbýti, tí at hann/hon krevur síni rættindi sambært reglunum um foreldrafráveru, so kann løntakari krevja eina samsýning sum svarar til løn í 50 vikur. Greinin fevnir eisini um uppsøgn o. a., um tað snýr seg um uppsøgn vegna viðgongu, fyri og eftir barnsburð umframt ættleiðing. Í 5. stk. verður ásett, at tað áliggur arbeiðsgevaranum at prógva, at uppsøgnin ella møguligt vanbýti ikki varð grundað á § 6, 1. og 2. stk. (sonevnd øvug prógvbyrða).

**ad § 7.**

Um so skuldi hent, at frálærutilfar til undirvísing ella uppaling barna gongur í móti javnstøðuhugsanini, er møguleiki at nokta at nýta tílíkt tilfar. Skal tílíkt tilfar noktast, eigur at verða farið fram eftir § 11 í fyrsta umfari.

2. stk. Er eitt krav til allar uppalarar at skipa so fyri, at gentur og dreingir ikki velja lærugreinir o.a. eftir kynsbundnum handahógvi, samstundis sum allir undirvísingarstovnar skulu reika so fyri, at gentur og dreingir (kvinnur/menn) fáa ein óskerdan møguleika at velja eftir áhuga og evnum. Hugsast kann, at uppalandi stovnar skipa val harna soleiðis, at tey í roynd og veru noyðast at velja kynsbundið (t.d. lærugreinin smíð og handarbeiði liggja samstundis). Kann hetta staðfestast, er tað brot á hesa lóg.

**ad § 8.**

Henda grein skal tryggja, at bæði kynini verða umboðað so eins í tali sum gjørligt í nevndum, ráðum og líknandi, sum fyrisitingarvaldið útnevnir. Eisini er greinin galdandi fyri tær nevndir, sum løgtingið og bý- og bygdaráðini útnevna, tá nevndin ikki nýtist at vera sett saman av fólki, sum eru løgtingslimir ella limir í bý- og bygdaráðunum.

Í 2. stk. verður eisini álagt privatum felagsskapum, ið hava uppskotsrættindi til somu nevndir, sum fyrisitingarvaldið útnevnir, at skjóta upp eins stórt tal av báðum kynunum. Er bert talan um eitt umboð ella lim, hevði verið hóskandi at skot-

ið upp ein frá hvørjum kyninum, soleiðis at útnevningarmyndugleikin kann seta saman nevndina ella ráðið við umleið eins nógvum kvinnum og monnum.

Í 3. stk. verður heimilað javnstøðunevndini at loyva undantøkum t.d., tá ið serligt innlit ella serkunnleiki skal til - ella tá ið eitt felag als ikki hevur limir ella bert fáar limir av øðrum kyninum. Javnstøðunevndin metir sjálv, um undantaksloyvi verður givið í hvørjum einstøkum føri ella gevur loyvi fyri eina yrkisgrein í t.d. eitt áramál.

**ad § 9.**

Sambært hesi grein verður sett á stovn ein javnstøðunevnd, sum skal virka undir landsstýrinum. Høvuðsendamálið við javnstøðunevndini verður at hava eftirlit við, at lógin verður bildin, og at hetta frægast gerst við ráðgeving og vegleiðing, soleiðis at so fá lógarbrot sum gjørligt verða framd. Eisini er ætlað, at javnstøðunevndin verður við í at skunda undir javnstøðustrembanina á tann hátt, at hon fylgir við, hvat fyriferst økinum innan- sum uttanlendis.

Ásannast má, at neyðugt verður við avgreiðslufólki, um javnstøðunevndin skal virka sambært endamáli hennara.

**ad § 11.**

Tá ið sagt verður, at fólk kunnu klaga til javnstøðunevndina, verður fyrst og fremst hugsað um fólk, sum eru partur í ein máli. Kortini ber til hjá øðrum fólki at gera nevndina varuga við viðurskifti, sum hon kann taka upp av sínum eintingum. 3. og 4. stk. snúgva seg um málsinnlit. Nevndin skal hava atgongd til allar neyðugar upplýsingar, sum hon metir hevur týdning fyri citt mál. Tá ið nevndin virkar undir vanligari tagnarskyldu, ber ikki til at halda upplýsingum aftur við slíkari grundgeving.

**ad § 12.**

Vanliga má roknast við, at atgerðirnar sambært § 11, 5. stk., fara at fáa tey flestu viðurskiftini í rættlag. Skuldi tað kortini hent, at ein áheitan frá javnstøðunevndini ikki fær viðurskiftini í rættlag, ber tað nevndini til at heita á ákæruvaldið at reisa ákæru fyri brot á lógina ella sjálv at krevja dóm í einum rættarmáli.

Er talan um almennan stovn, skal nevndin fyrst royna at fáa tann yvirskipaða stovnin at ógylda avgerðina, ið tann undirskipaði stovnurin hevur tikið.

**ad § 13.**

Til tess at verja løntakarar í móti semjum og sáttmálum - munnligum ella skrivligum - sum geva verri sømdir, enn henda lóg veitir, verða allar tílíkar semjur at meta sum ógyldugar, antin lutvíst ella í sínum fulla líki. Hetta er eisini galdandi fyri avtalur, gjørdar fyri gildi lógarinnar, men mismunur í peningini kann bert krevjast frá tí degi, lógin kom í gildi.

**ad § 14.**
Sektaráleggingin fer fram sambært vanligum reglum og kann áleggjast eisini í sambandi við borgarligt rættarsókni, um hetta verður kravt. Linari revsing kann eisini koma upp á tal sambært vanligum reglum - t.d. ávaring.

**ad § 15.**
Lógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Stundum kann verða torført at staðfesta, hvørt brot á lógina er farið fram fyri ella eftir, at lógin er komin í gildi. Sum dømi kann nevnast, at ein sáttmáli er gjørdur fyri, at lógin er komin í gildi. Í tílíkum føri er ikki avgerandi, nær sáttmálin er gjørdur, men um hann í sínum innihaldi stríðir ímóti lógini eftir, at hou er komin í gildi. Stríðir ein sáttmáli ímóti lógini, verður t.d. ein peningaligur mismunur at rinda frá tí degi, lógin koun í gildi, og ikki frá tí at sáttmálin varð undirskrivaður ella somja gjørd. Eisini kann hugsast, at talan verður um at áleggja arbeiðsgevara endurgjald fyri brot á lógina.

Men endurgjaldið skal ikki vigast eftir, hvørt talan er um færri enn 39 ella 78 vikur eftir, at lógin kom í gildi. Annars er at viðmerkja, at vanligu fyrningarfreistirnar galda, tá ið tað snýr seg um peningakrøv.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 131/1992: Løgtingslóg um javnstøðu millum kvinnur og menn.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 16. mars 1993 og eftir 1. viðgerð tann 31. mars 1993 beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og setir ein sund nevnd fram soljóðandi:

## Uppskot

## til

## samtyktar

Rættarnevndin verður millumtinganevnd, ið viðger tingmáli um løgtingslóg um javnstøðu millum kvinnur og menn.

# 132. Sterkstreymslóggávan

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um sterkstreymsútbúnað.*

**1. kapittul**

**§ 1.**

Sum sterkstreymsútbúnaður er at skilja í hesi lóg virki til framleiðslu, flyting og býti av elmegi við so høgum spenningi ella so stórari streymstyrki, at vandi kann standast av, og allar íbundnar elinnleggingar, nýtslulutir og tílíkt.

**2. stk.** Sum eltilfar er at skilja maskinur, tól og tilfar av øllum sløgum, ið nýtt verða í sterkstreymsútbúnaðum.

**§ 2.**

Landsstýrið ásetir reglur um:

1) gerð og rakstur av sterkstreymsútbúnaðum,
2) framleiðslu, eftirkannan, góðkenning, sølu og nýtslu av eltilfari.
3) gerð og rakstur av øðrum útbúnaðum, ið standa hættisliga nær ella hava samband við sterkstreymsútbúnað.

**2. stk.** Landsstýrið kann heimila elnevndini, sbr. § 6, á nærri avmarkaðum økjum at áseta tær reglur, sum nevndar eru í 1. stk. Landsstýrið kann harumframt áseta reglur fyri at gera frávik frá ásetingunum.

*lagtingslov om stærkstrømsanlæg.*

**Kapitel 1**

**§ 1.**

Ved stærkstrømsanlæg forstås i denne lov anlæg til produktion, transmission og distribution af elektricitet med så høj spænding eller så stor strømstyrke, at der kan opstå fare, samt alle tilsluttede elektriske installationer, brugsgenstande og lignende.

**Stk. 2.** Ved elektrisk materiel forstås maskiner, apparater og materiel af enhver art, der indgår i stærkstrømsanlæg

**§ 2**

Landsstyret fastsætter bestemmelser om:

1) udførelse og drift af stærkstrømsanlæg,
2) fremstilling, prøvning godkendelse, forhandling og benyttelse af elektrisk materiel,
3) udførelse og drift af andre anlæg i farlig nærhed af eller i forbindelse med stærkstrømsanlæg.

**Stk. 2.** Landsstyret kan bemyndige elnævnet, jfr. § 6, på nærmere afgrænsede områder at fastsætte de i stk. 1 nævnte bestemmelser. Landsstyret kan endvidere fastsætte regler for meddelelse af dispensationer fra bestemmelserne.

**3. stk.** Landsstýrið kann áseta, at ávís sløg av sterkstreymsútbúnaðum og ávísir bólkar av eltilfari ikki skulu koma undir tær reglur, sum nevndar eru í 1. stk.

**4. stk.** Landsstýrið kann áseta, at tær reglur, sum danska "elektricitetsrådet" eina og hvørja tíð ger um:

1) gerð og rakstur av sterkstreymsútbúnaðum,
2) gerð og rakstur av øðrum útbúnaðum, ið eru hættisliga nær ella í sambandi við sterkstreymsútbúnað og
3) gerð, eftirkannan og nýtslu av eltilfari, sum eru kunngjørdar í "stærkstrømsreglementet" (sterkstreymsreglugerðini), allar ella lutvíst skulu galda her á landi. Landsstýrið kann harumframt áseta, at tær umsitingarligu reglumar í sterkstreymsreglugerðini heilt ella lutvíst skulu galda her á landi.

**5. stk.** Tær reglur, ið verða ásettar eftir 2. og 3. stk. og sterkstreymsreglugerðin, sbr. 4. stk., sleppa undan upptøku í Kunngerðarblaðnum. Upplýsing um innihaldið í teimum reglum, sum ásettar eru sbr. hesi grein, fáast hjá elnevndini.

**Stk. 3.** Landsstyret kan bestemme, at visse former for stærkstrømsanlæg og visse grupper af elektrisk materiel ikki skal være omfattet af de i stk. 1 nævnte bestemmelser.

**Stk. 4.** Landsstyret kan bestemme, at de af det danske elektricitetsråd til enhver tid udfærdigede bestemmelser om:

1) udførelse og drift af stærkstrømsanlæg,
2) udførelse og drift af andre anlæg i farlig nærhed af eller i forbindelse med stærkstrømsanlæg og
3) konstruktion, prøvning og benyttelse af elektrisk materiel, som er bekendtgjort i stærkstrømsreglementet, helt eller delvis skal gælde her i landet. Landsstyret kan endvidere bestemme, at stærkstrømsreglementets administrative bestemmelser helt eller delvis skal gælde her i landet.

**Stk. 5.** Bestemmelserne, der fastsættes efter stk. 2 og 3 samt stærkstrømsreglementet, jfr. stk. 4, er undtaget fra optagelse i Kunngerðarblaðið. Oplysning om indholdet af de i medfør af denne paragraf fastsatte bestemmelser fås hos elnævnet.

## § 3.

Eftirlitið við, at tær reglur, ið eru ásettar sbr. § 2., verða hildnar, verður útint av elnevndni sbr. reglum, ið landsstýrið ásetir.

**2. stk.** Til tess at fremja eftirlitið við eltilfari, kann landsstýrið m.a. áseta

## § 3.

Tilsynet med overholdelse af de i medfør af § 2 fastsatte bestemmelser udøves af elnævnet efter regler fastsat af landsstyret.

**Stk. 2.** Til gennemførelse af kontrollen med elektrisk materiel kan lan-

reglur um:

1) Krav um, at eltilfar, ið verður selt, útflýggjað ella innlagt til nýtslu her á landi, er fráboðað DEMKO (Danmarks elektriske materielkontrol) við atliti at skráseting ella skrásett av DEMKO.

2) Forboð móti sølu, útflýggjan, innlegging og nýtslu, heruppií framhaldandi nýtslu av tilfari, ið kann gerast vandamikið fyri persónar, húsdjór og ogn.

3) Upplýsingarskyldur viðvíkjandi eltilfari, um samsvar við galdandi konstruktiónsfyriskipanir ikki er staðfest, ta stund søla, útflýggjan ella innlegging av tilfarinum fer fram.

4) Skylda hjá monnum, ið selja eltilfar, at taka aftur tilfar, ið kemur undir forboð, ið er gjørt sambært regluni í nr. 2, og at halda aftur tílíkt tilfar eftir nærri avgerð frá elnevndini.

dsstyret blandt andet fastsætte bestemmelser om:

1) Krav om, at elektrisk materiel, der sælges, udleveres eller installeres til brug her i landet, er anmeldt til DEMKO (Danmarks elektriske materielkontrol) med henblik på registrering eller registreret af DEMKO.

2) Forbud mod salg, udlevering, installation samt benyttelse, herunder fortsat benyttelse, af materiel, der kan bringe sikkerheden for personer, husdyr eller ejendom i fare.

3) Oplysningspligt med hensyn til elektrisk materiel, hvis overensstemmelse med gældende konstruktionsforskrifter ikke er konstateret på tidspunktet for salg, udlevering eller installation af materiellet.

4) Pligt for forhandlere af elektrisk materiel til at tilbagetage materiel, omfattet af forbud nedlagt i medfør af bestemmelsen i nr. 2, samt til at tilbageholde sådant materiel efter elnævnets nærmere bestemmelse.

**§ 4.**

Landsstýrið kann áseta reglur um, at eigarar og nýtarar av sterkstreymsútbúnaðinum, virkiseigarar, innflytarar og menn, ið selja eltilfar, hava skyldu at geva allar upplýsingar, sum elnevndin metir at vera neyðugar til tess at útinna eftirlitið sbr. § 3, 1. stk.

**2. stk.** Tá ið tað eftirlit, sum nevnt er í § 3, 1. stk. verður útint, hava umboðs-

**§ 4.**

Landsstyret kan fastsætte bestemmelser om, at ejere og brugere af stærkstrømsanlæg samt fabrikanter, importører og forhandlere af elektriskt materiel er forpligtet til at meddele alle oplysninger, som elnævnet anser for nødvendige for udøvelse af tilsynet efter § 3, stk. 1.

**Stk. 2.** Ved udøvelse af det i § 3, stk. 1, nævnte tilsyn har repræsentanter for

menn hjá elnevndini uttan rættarúrskurð við at vísa hóskandi heimild atgongd til allan sterkstreymsútbúnað og til øll høli, har eltilfar verður framleitt, selt, goymt ella nýtt.

**3. stk.** Landsstýrið kann áseta reglur um rætt til at kæra avgerð, sum elnevndin hevur tikið, eitt nú at avgerðirnar ikki skulu kunna verða kærdar til landsstýrið.

§ 5.

Við bót verður hann revsaður, ið:

1) skúgvar til viks treytir fyri loyvi sambært lógini ella sambært fyriskipanum, útgivnar sambært lógini, ella
2) letur vera við at lýða forboð ella boð, ið eru fráboðað sambært lógini ella fyriskipanum, ið eru settar eftir lógini.

**2. stk.** Í fyriskipanum, sum verða settar sbr. lógini, eitt nú sterkstreymsreglugerðin, kann revsing verða ásett við bót fyri brot móti ásetingum í fyriskipanunum.

**3. stk.** Fyri brot, sum løgfrøðiligir persónar, eitt nú feløg, felagsskapir, grunnar, kommunur og landið gera, kann verða álagt tí løgfrøðisliga persóni sum slíkur sektarábyrgd.

**4. stk.** Fyrningarfrestin fyri revsiábyrgdina er 10 ár.

## 2. kapittul

§ 6.

Sett verður á stovn elnevnd, ið røkir teir fyrisetningar, ið eru settir nevndini

elnævnet uden retskendelse mod forevisning af behørig legitimation adgang til alle stærkstrømsanlæg samt til alle lokaler, hvori der fremstilles, forhandles, oplagres eller benyttes elektrisk materiel.

**Stk. 3.** Landsstyret kan fastsætte bestemmelser om adgangen til at påklage afgørelse, truffet af elnævnet, herunder at afgørelserne ikke skal kunne påklages til landsstyret.

§ 5.

Med bøde straffes den, der

1) tilsidesætter vilkår for en tilladelse i henhold til loven eller i henhold til forskrifter, udstedt i medfør af loven, eller
2) undlader at efterkomme forbud eller påbud, der er meddelt i henhold til loven eller i henhold til forskrifter, udstedt i medfør af loven.

**Stk. 2.** I forskrifter, der udstedes i medfør af loven, herunder stærkstrømsreglementet, kan der fastsættes straf af bøde for overtrædelse af bestemmelser i forskrifterne.

**Stk. 3.** For overtrædelser, begået af juridiske personer, herunder selskaber, foreninger, fonde, kommuner og landet, kan der pålægges den juridiske person som sådan bødeansvar.

**Stk. 4.** Forældelsesfristen for strafansvaret er 10 år.

## Kapitel 2

§ 6

Der oprettes et elnævn, der varetager de opgaver, som er henlagt til nævnet i

í hesi lóg ella í fyriskipanum, uppsettar samhært lógini. Elnevndin skal umframt vera landsstýrinum til hjálpar í neyðugan mun við ráðum o.s.fr. í spurningum, sum koma undir hesa lóg.

**2. stk.** Elnevndin er samansett av formanni, ið skal vera løgfrøðingur, rakstrarleiðaranum fyri SEV, landsverkfrøðinginum; einum góðkendum elinnleggjara, sum Føroya elinnleggjarfelag tilnevnir, og einum limi við elfrøðiligari útbúgving. Landsstýrið tilnevnir formannin og seinast nevnda lim.

**3. stk.** Nevndarlimunum kann verða veitt árlig samsýning, og fáa teir endurgjald fyri skjalprógvaðar ferðaútreiðslur. Teir limir, sum ikki fáa samsýning, fáa dagpening samsvarandi landsstýrisins reglum um samsýning til limir í nevndum, ráðum o.ø.

**4. stk.** Nevndin ger uppskot til starvsskipan, ið landsstýrið skal góðkenna.

**5. stk.** Nevndin kann fáa sær neyðug hjálparfólk.

§ 7.

Útreiðslurnar av virkseminum hjá elnevndini verða goldnar úr landskassanum.

**3. kapittul**

§ 8.

Sterkstreymsútbúnaðir skulu ikki órógva raksturin av øðrum virkjum, ið eru. Slepst undan hesum órógvi við at seta í verk trygdartiltøk, verða hesi

denne lov eller i bestemmelser, udfærdiget i medfør af loven. Elnævnet skal endvidere bistå landsstyret i uødvendigt omfang ved rådgivning m.v. i spørgsmål omfattet af loven.

**Stk. 2.** Elnævnet består af en formand, der skal være jurist, driftslederen for S.E.V., landsingeniøren, en autoriseret elinstallatør, udpeget af Føroya elinnleggjarafelag samt et medlem med elektroteknisk uddannelse. Landsstyret udpeger formanden samt det sidstnævnte medlem.

**Stk. 3.** Nævnets medlemmer kan tillægges årligt vederlag og får godtgørelse for dokumenterede rejseudgifter. De medlemmer, som ikke oppebærer vederlag, får diæter i overensstemmelse med landsstyrets regler om vederlag til medlemmer af kommissioner, nævn m.m.

**Stk. 4.** Nævnet udfærdiger forslag til forretningsorden, der skal godkendes af landsstyret.

Stk. 5. Nævnet kan antage fornøden medhjælp.

§ 7.

Udgifterne ved elnævnets virksomhed afholdes af landskassen.

**Kapitel 3**

§ 8

Stærkstrømsanlæg må ikke udsætte driften af andre bestående virksomheder for forstyrrelse. Kan forstyrrelserne undgås ved iværksættelse af sikker-

gjørd fyri kostnað tess virkiseigara (nýtara), ið hevur verið atvold í órógvunum. Hini virkini skulu tó bera ein hóskandi part av útreiðslunum, um tiltøkini, ið verða sett í verk, føra við sær munandi fyrimunir fyri rakstur teirra.

**2. stk.** Spurningar um,

a) hvør vítt ein sterkstreymsútbúnaður ger tað, at raksturin av verandi virki verður fyri órógv,
b) hvørji trygdartiltøk skulu verða tikin til tess at útihýsa órógvinum,
c) hvør, ið skal seta trygdartiltøkini í verk, og
d) um og í hvønn mun hini virkini skulu bera útreiðslurnar í sambandi við hetta, verða avgjørdir, um semja ikki fæst, av serligari nevnd, og hennara avgerð er endalig og bindandi fyri partarnar.

**3. stk.** Nevndin kann gera av, at ikki kann verða farið undir bygging ella rakstur av sterkstreymsútbúnaðinum, fyrr enn tey trygdartiltøk, sum verða hildin neyðug, eru framd.

**4. stk.** Í úrskurðinum ásetir nevndin, hvør av pørtunum skal bera kostnaðin av nevndarviðgerðini av málinum og við hvørjari upphædd. Spurningurin um støddina á upphæddini kann tó verða lagdur fyri landsstýrið innan 14 dagar aftaná, at úrskurðurin er kunngjørdur.

**5. stk.** Tann serliga nevndin er samansett av sorinskrivaranum ella einum hedsforanstaltninger, udføres disse på bekostning af det anlægs ejer (bruger), som har forårsaget forstyrrelserne. De øvrige virksomheder skal dog bære en passende del af omkostningerne, såfremt foranstaltningernes iværksættelse medfører væsentlige fordele for deres drift.

**Stk. 2.** Spørgsmål om

a) hvorvidt et stærkstrømsanlæg udsætter driften af en bestående virksomhed for forstyrrelse,
b) hvilke sikkerhedsforanstaltninger, der skal træffes for at udelukke forstyrrelsen,
c) hvem der skal bringe sikkerhedsforanstaltningerne til udførelse, og
d) hvorvidt og i hvilket omfang de øvrige virksomhder skal bære udgifter i forbindelse herved, afgøres, såfremt der ikke kan opnås enighed af et særligt nævn, hvis afgørelse er endelig og bindende for parterne.

**Stk. 3.** Nævnet kan bestemme, at stærkstrømsanlæggets udførelse eller drift ikke må påbegyndes, inden de sikkerhedsforanstaltninger, som findes nødvendige, er truffet.

**Stk. 4.** I kendelsen fastsætter nævnet, hvem af parterne der skal bære omkostningerne ved nævnets behandling af sagen og med hvilket beløb. Spørgsmålet om beløbets størrelse kan dog indbringes for landsstyret inden 14 dage efter kendelsens forkyndelse.

**Stk. 5.** Det særlige nævn består af sorenskriveren eller af en af dennes

av fulltrúum hansara sum formaður og 2 øðrum limum, ið verða tilnevndir frá einum máli til annað av elnevndini uttanum teir.

## 4. kapittul

### § 9.

Hann, ið rekur sterkstreymsútbúnað, hevur skyldu at endurrinda tann skaða á persón ella ognir, sum stendst av útbúnaðinum, uttan so at tað verður upplýst, at hin skaddi sjálvur við vilja ella av óansni hevur velt skaðan, ella at hann (skaðin) ikki kundi havt verið forðaður við tí sketni ella umhugsan, sum raksturin av slíkum útbúnaði krevur bæði viðvíkjandi rakstrarhátti og tilfari.

### § 10.

Hann, sum verður fyri skaða, hevur rætt til endurgjald ikki bara fyri tann skaða, sum hann beinleiðis líður, men eisini fyri tær útreiðslur, vinnumiss og ampar, ið harav standast.

**2. stk.** Er persónskaði, verður at rinda endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku, heilsubótarútreiðslur og annan miss, sum stendst av skaðanum, og eina samsýning fyri sviða og pínu. Hava varandi fylgjur staðist av skaðanum, verður eisini at rinda samsýning fyri varandi mein og endurgjald fyri miss ella skerjan av vinnunevni. Virðið av arbeiði í heiminum verður sett javnt við vinnuinntøku.

**3. stk.** Við deyða skal endurgjald verða goldið fyri rímiligar jarðarferðaútreiðslur og endurgjald til tann, ið við

fuldmægtige som formand, og af 2 andre medlemmer, der udpeges fra sag til sag af elnævnet uden for dets egen midte.

## Kapitel 4

### § 9.

Den, der driver et stærkstrømsanlæg, er pligtig at erstatte den skade på person eller gods, som forvoldes af anlægget, medmindre det oplyses, at den skadelidende selv forsætlig eller ved uagtsomhed har hidført skaden, eller at denne ikke kunne have været afværget ved den agtpågivenhed og omhu, som driften af sådanne anlæg kræver såvel i hensende til driftsmåden som til materiellet.

### § 10.

Den skadelidende er berettiget til erstatning ikke blot for den skade, som han umiddelbart lider, men også for deraf følgende udgifter, næringstab og ulempe.

Gjaldstovan, ið umsitur lógina um eydnuspæl, hevur heitt á landsstýrið um at broyta lógina soleiðis, at hon ikki er so tíðarkrevjandi at umsita, tí Gjaldstovan seinastu árini hevur verið noydd at skerja talið á starvsfólki.

Talan fer fyrst og fremst at verða um, at loyva feløgum, sum hava bingo, at sleppa undan at lata inn roknskapin, meðan tað í fyrstu atløgu er ætlanin framhaldandi at krevja roknskapin frá teimum landsumfatandi lutaseðlasølunum.

Landsstýrið mælir løgtinginum til at samtykkja broytingina.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 134/1992: Broyting í løgtingslóg um eydnuspæl.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 16. mars 1993 og eftir 1. viðgerð tann 25. mars beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið, og kann ein samd nevnd taka undir við uppskoti landsstýrisins, tó við teirri broyting, at nevndin er av teirri áskoðan, at staðfestast skal í lógini, at gjaldstovan fær heimild at gera stakroyndir í sambandi við reglurnar í § 6 og setir tí fram soljóðandi:

## Broytingaruppskot

## til

## uppskot landsstýrisins

| | |
|---|---|
| Í § 6, stk. 3 verður skoytt uppí: | I § 6 stk. 3 indsættes som nyt pkt.: |
| "Gjaldstovuni verður heimilað at gera stakroyndir." | "Gjaldstovan bemyndiges til at foretage stikprøver." |

# 135. Løgtingslóg um gjøld o.l. fyri innkrevjing av falnari skuld til landskassan

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um gjøld o.l. fyri innkrevjing av falnari skuld til landskassan.*

*lagtingslov om gebyr i forbindelse med indhentning af forfalden gæld til landskassen.*

**§ 1.**

Gjaldstovuni verður heimilað at taka gjøld í sambandi við innkrevjing av skattum, avgjøldum, rokningum fyri almennar stovnar, afturhaldsskyldugum sosialum veitingum, alimentatión o.l.

**§ 1.**

Gjaldstovan bemyndiges til at opkræve gebyr i forbindelse med indhentning af skat, afbetalinger, regninger for offentlige institutioner, tilbageholdelsesforpligtelser for sociale ydelser, alimentation o.l.

**§ 2.**

Føroya Landsstýri ásetir í kunngerð tær upphæddir, sum verða kravdar samkvæmt hesi lóg.

**§ 2.**

Færøernes Landstyre fastsætter ved bekendtgørelse de beløb, som indkræves i henhold til denne lov.

**§ 3.**

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd.

**§ 3.**

Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjordt.

**Viðmerkingar.**

Eitt av eyðkennunum fyri innkrevjingaruppgávuna er, at uppgávumongdin økist í ringum tíðum, og verður tí verri og verri at fáa pening inn. Tí hevur tað sera óhepnar fylgjur, at skorið verður í játtanini til hesar uppgávur.

Gjaldstovan hevur fingið fleiri nýggjar innkrevjingaruppgávur, uttan at játtanin til hetta er hækkað samsvarandi.

Sum nú er, er einki samsvar millum, hvussu játtanin verður roknað út, og tað virksemi, sum er á stovninum. Tí er neyðugt, at ein ella onnur "regulerandi

mekanisma" verður innbygd millum útrokningina av játtanini til stovnin og virksemi stovnsins. Ein vegur á leiðini er at geva stovnunum heimild at krevja inn ómaksgjøld, sum eru í samsvar við tær útreiðslur, stovnurin hevur av innkrevjingini.

Ein annar trupulleiki í sambandi við innkrevjingina er tann lítla ávirkanin, ein rykkjari hevur, m.a. tí onki ómaksgjald verður kravt fyri tær meirútreiðslur, hesir rykkjarar hava fyri Gjaldstovuna. Um tað kostaði at verða ryktur, hevði hetta óivað gjørt, at nøkur fleiri góvu rykkjarunum ans og rindaðu rokningarnar.

Um ávís ómaksgjøld verða ásett fyri tær innkrevjingaruppgávur, ið Gjaldstovan røkir, skuldi betri møguleiki verið fyri at fingið samanhang millum virksemi og játtan Gjaldstovunnar, bæði í góðum og ringum tíðum.

## Álit

### I

*løgtingsmáli nr. 135/1992:Løgtingslóg um gjøld o.l. fyri innkrevjing av falnari skuld til landskassan.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 16. mars 1993 og eftir 1. viðgerð 24. mars 1993 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jacob Lindenskov, Jørgen Niclasen og Óli Breckmann) vísir á, at tað er fyri at tryggja landskassanum inntøkur, at landsstýrið setir fram uppskot um heimild til landsstýrið við kunngerð at loyva stovnum at krevja upp eykagjøld.

Meirilutin tekur undir við uppskoti landsstýrisins, men minnir samstundis á, at tað kann gerast ovboðið, um ov nógv eykagjøld verða løgd á borgaran fyri tænastur. Tað eigur ikki at føra til, at nøkur eykaumsiting verður stovnað við endamáli at krevja gjøld av gjøldum.

Í treysti til, at landsstýrið hevur hetta í huga, hvørja ferð tílík heimild verður játtað, tekur meirilutin (Jacob Lindenskov, Jørgen Niclasen og Óli Breckmann) undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Finnbogi Arge) tekur ikki undir við málinum við teirri viðmerking, at heimildin lættliga kann misnýtast av tí almenna. Minnilutin setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Lasse Klein) tekur støðu í tingsalinum.

# 136. Bekendtgørelse af overenskomst af 2. marts 1990 med Finland, Island, Norge og Sverige om oprettelse af Det Nordiske Miljøfinansieringsselskab

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið góðkennir at "Bekendtgørelse af overenskomst af 2. marts 1990 med Finland, Island, Norge og Sverige om oprettelse af Det Nordiske Miljøfinansieringsselskab" verður kunngjørd í Føroyum.

**Viðmerkingar:**

Sáttmálin millum Danmark, Finnland, Ísland, Noreg og Svøríki um stovnan av Norðurlendska Umhvørvisfíggingarfelagnum umfatar eisini Føroyar.

Við hesum sáttmála stovnseta norðurlond Norðurlendska Umhvørvisfíggingarfelagið. Enska navnið á felagnum er "Nordic Enviroment Finance Corporation (NEFCO)". Stovnsetingin av fíggingargrunninum er ein liður í tí norðurlendska umhvørvistarvinum og skal serliga fremja íløgur av norðurlendskum áhuga í Eystureuropa við at fíggja virkir í hesum londum.

Viðtøkurnar hjá NEFCO hava ásetingar um endamál, virksemi og umsiting. Stovnsfæið er 36.mió. S.D.R., sum verður goldið av teimum 5 sáttmálapørtunum. (Føroyar eru soleiðis ikki fíggjarliga bundnar).

Felagið fíggjar virkir í Eystureuropa, sum við samogn, teknologiflutningi ella øðrum formi fyri samstarvi við norðurlendsk virki fremja verkætlan sum hava við sær framleiðslu av ídnaðarútgerð ella aðrari ídnarligari nýtslu av umhvørvis tøknifrøði ella nýtslu av tænastuveitingum innan umhvørvisvernd.

**Eyðkendar verkætlanir kunnu verða:**

- virkir sum framleiða útbúnað til t.d. roykreinsing og vatnreinsing ella mátingartól.

- virkir ið fáast við nýtímansgerð og ístandsetan av orkuverkum og tilevningarídnaði,
- ráðgevingarvirksemi, í sambandi við umhvørvisíløgur.

Til tess at stuðla hesum virkjum kann fíggingarfelagið tekna partabrøv ella lutaprógv, veita lán ella veðhald. Verkætlaninar skulu verða tekniskt og fíggjarliga skilagóðar.

Stuðul til forkanningar viðvíkjandi umhvørvisverkætlanum í Eysturevropa, kunnu játtast t.d. úr "Den Nordiske Projektfond, NOPEF".

NEFCO skal virka í eini royndartíð uppá 6 ár. Norðurlendska ráðharraráðið skal í seinasta lagi í 1996 taka støðu til, um felagið skal halda fram.

Nordisk Investeringsbank í Helsinki tekur sær av skrivstovuarbeiðinum hjá NEFCO fram til 1. juli 1993.

Á fundi millum norðurlendsku umhvørvisráðharrarnar í Oslo 3. mars 1993 varð avgjørt at broyta viðtøkurnar í NEFCO soleiðis, at NEFCO fær egna skrivstovu undir leiðslu av forstjóra, ið settur verður av stýrinum. Starvsfólkið hjá NEFCO verður sett í Norðurlendska Investeringsbankan (NIB) til at fremja uppgávurnar í NEFCO. Ilenda broyting er galdandi frá 1. juli 1993.

# 137. Søla burtur av fastogn landsstýrisins í Tórshavn

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um sølu av parti av fastogn landsstýrisins í Tórshavn.*

**§ 1.**

Landsstýrinum verður heimilað at selja uml. 25 m² burtur av matr. nr. 1037 c, Tórshavn.

**§ 2.**

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

*lagtingslov om salg af del af landsstyrets faste ejendom i Tórshavn.*

**§ 1.**

Landstyret bemyndiges til af matr. nr. 1037 c, Tórshavn, at sælge ca. 25 m².

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjordt.

**Viðmerkingar.**

Eigarin av matr. nr. 1035 b, Tórshavn, hevur søkt um loyvi at keypa frá landsstýrinum ein kíla upp á uml. 25 fermetrar burtur av landsins ogn matr. nr. 1037 c, Tórshavn, at leggja afturat ogn síni.

Marknajavningin millum hesar ognir verður gjørd, fyri at matr. nr. 1035 b kann gera sær P-øki og møguliga bilhús og at fáa beinleiðis atgongd til vegin á Frælsinum.

Tá nevnda jarðarstykki er av slíkum skapi, at tað ikki kann metast at hava nakran týdning fyri matr. nr. 1037 c, og tá landsstýrið hevur áhuga í at fyribyrgja gjøgnumgongd og óviðkomandi parkering á skúlaøkinum á Trøðni, verður mælt til at selja nevnda stykki.

**Álit**

**í**

*Løgtingsmáli nr. 137/1992: Søla hurtur av fastogn landsstýrisins í Tórshavn*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 16. mars 1993 og eftir 1. viðgerð tann 23. mars beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og mælir ein samd nevnd tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

# 138. Løgtingslóg um sølu av einum parti av fastogn hjá Klaksvíkar Sjúkrahúsi

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um sølu av einum parti av fastogn hjá Klaksvíkar Sjúkrahúsi.*

§ 1.
Landsstýrinum verður heimilað at loyva sølu av matr. nr. 590 h, 590 i og 590 l, Klaksvík.

§ 2.
Løgtingslógin kemur í gildi, tá hon verður kunngjørd.

*lagtingslov om salg af en del af Klaksvig Sygehus' faste ejendom.*

§ 1.
Landsstyret bemyndiges til at tillade salg af matr. nr. 590 h, 590 i og 590 l, Klaksvík.

§ 2.
Lagtingsloven træder i kraft ved dens kundgørelse.

**Viðmerkingar:**

Stýrið fyri Klaksvíkar Sjúkrahús hevur samtykt at selja tey 3 læknahúsini matr. nr. 590 h, 590 i og 590 l, í Mylnugøtu, Klaksvík. Grundin til ynski stýrisins er, at talið á avloysarum er minkað munandi á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.

Ætlanin er ikki at selja øll húsini undir einum, men tá ið heimild er fingin til tess, at avhenda tey so við og við, so rímiligur prísur fæst fyri tey.

Í løtuni tykist ongin orsøk vera til, at tað almenna skal eiga húsini, og fyri at sleppa undan teimum útreiðslum, ið standast av slíkari ogn, so sum ábøtur, trygging o.a., heldur landsstýrið tað vera skilabest at selja til hægstbjóðandi.

Ágóðin av søluni verður góðskrivaður landskassanum.

**Álit**

**í**

*løgtingsmáli nr. 138/1992: Løgtingslóg um sølu av einum parti av fastogn hjá Klaksvíkar Sjúkrahúsi.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 16. mars 1993 og eftir 1. viðgerð tann 23. mars beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta. Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Anfinn Kallsberg, Heini O. Heinesen og Asbjørn Joensen) mælir til, at ágóðin av søluni verður góðskrivaður Klaksvíkar Sjúkrahúsi, at nýta til ábøtur, keyp og viðlíkahald av tólum v.m., og setir tí fram soljóðandi:

**broytingaruppskot**

**til**

**uppskot landsstýrisins**

Í § 1 verður skoytt uppí:

"Ágóðin av søluni verður góðskrivaður Klaksvíkar Sjúkrahúsi at nýta til ábøtur, keyp og viðlíkahald av tólum v.m."

I § 1 tilføjes:

"Provenuet af salget godskrives Klaksvíkar Sjúkrahúsi til betaling af reparationer, køb og vedligeholdelse af apparatur m.v."

Minnilutin (Finnbogi Arge og Birgir Danielsen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

# 139. Striking av skuld hjá Interkommunala Renovatiónsfelagsskapinum

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um striking av skuld hjá Interkommunala Renovatiónsfelagsskapinum.*

*lagtingslov om eftergivelse af det Interkommunale Renovationsfællesskabs gæld.*

**§ 1.**

Landsstýrinum verður heimilað at strika 33 mió. kr. í skuld hjá Interkommunala Renovatiónsfelagsskapinum, ið stavar frá útleggum fyri borgan fyri lán-

**§ 1.**

Landsstyret bemyndiges til at eftergive 33 mio. kr., som det Interkommunale Renovationsfællesskab skylder landskassen og som stammer fra landskas-

um hjá felagsskapinum.

**Stk. 2.** Strikingin er treytað av, at felagsskapurin ger neyðug tiltøk, sum frameftir gera javnvág í raksturin.

**§ 2.**

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

sens udlæg som kautionist for lån til fællesskabet.

**Stk. 2.** Eftergivelsen er betinget af, at fællesskabet gør nødvendige foranstaltninger, som fremover giver balance i driften.

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

**Viðmerkingar:**

Við løgtingslóg nr. 29 frá 5. mai 1981 fekk landsstýrið heimild til landskassans vegna at veðhalda fyri láni til Interkommunala Renevatiónsfelagskapin til bygging av brennistøð.

Støðin var mett at kosta (í 1980 prísum) 29,8 mió. kr., og skuldi fløgan øll fíggjast við lánið. Sum kunnugt gjørdist støðin væl dýrari enn mett, og vóru samlaðu fløgurnar í støðina, tá ið hon stóð liðug í 1989, 104 mió. kr.

Síðani brennistøðin hjá IRF byrjaði at taka í móti í 1989, hevur raksturin givið hall, í 1989 10 mió. kr., í 1990 9,4 mió. kr. og í 1991 3,7 mió. kr., í 1992 verður rakstrarhallið sambært fyribilstølum 1,7 mió. kr., (øll tøl eru aftan á rentur, men áðrenn avskrivingar/avdráttir).

Størsti parturin av inntøkunum hjá IRF stava frá limagjaldinum frá kommununum. Limagjaldið er kr. 916,- pr íbúgva pr. ár. Hetta gav í 1992 27,9 mió. kr. av eini inntøku upp á tilsamans 31,2 mió. kr. Tá støðin byrjaði at taka ímóti, var limagjaldið kr. 650,- pr. íbúgva pr. ár. Hetta er síðani hækkað til kr. 790,- í 1990 og til kr. 916,- í 1991. Aðrar inntøkur hjá felagnum eru inntøkur av burturkasti frá virkjum. Gjald fyri virkisburturkast er ásett til kr. 120,- rúmmeturin og gav í 1992 3,2 mió. kr.

Uppskot hevur verið frammi um at fáa felagnum fleiri inntøkur við at hækka limagjaldið og at áseta gjald fyri ruskposar, men hetta vann ikki frama millum limakommununar.

Samlað skuld hjá IRF var pr. 31. desember 1992 uml. 144 mió. kr. Sambært fyribils tølum, eru aktivini hjá IRF pr. 31. desember1992 bókað til eitt virði upp á 116,7 mió. kr. Eginognin var sostatt negativ uml. 28 mió. kr. Skuldin hjá IRF pr. 31. desember 1992 kann sundurgreinast soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| *Stuttfreistað lán* | | 4,3 mió. kr. |
| *Langfreistað lán:* | | |
| Bank Nederlandse Gem. | hfl. 4,5 mió. ella | 15,6 mió. kr. |
| Westdeutche Landesbank | DM 15,4 mió. ella | 60,0 - - |
| Nykredit | | 28,4 - - |
| Landsk.útl. holl. lánið | | 29,7 - - |
| Landsk.útl. Westd. L.b | | 6,7 - - |
| Fremmand skuld í alt | | 144,7 - - |

Hálendska lánið varð tikið í 1981, og veitti landsstýrið sambært nevndu løgtingslóg veðhald fyri láninum. Lánið er høgtrentað fastrentu lán (13 1/8% p.a. av retskuldini). Lánið verður avdrigið við 1.140.000 Hfl. um árið, og skal sambært lánsavtaluni verða afturgoldið í oktober 1996. Roynt hevur verið at fáa hetta lánið umlagt, men tað hevur ikki eydnast.

DEM-lánið varð tikið í tveimum, í 1988 og 1989. Landsstýrið veðheldur eisini fyri hesum láninum sambært tyrr nevndu løgtingslóg. Lánið hevur variabla rentu (Libor-rentu), og er avdráttarfrítt til forfallsdagalt til gjaldingar í mai 1993.

IRF hevur 2 lán frá Nykredit. Restskuldin av hesum lánunum er 10 mió kr. og 18,4 mió. kr. Hetta er annuitetslán við eini rentu upp á ávikavist 10% og 12% p.a. Lánini skuln verða afturrindaði í 2010. Einki landskassaveðhald er fyri hesum lánum.

| | |
|---|---|
| Støðin í Leirvík er bókað til eitt virði uppá | 75,7 mió. kr. |
| Fyrireikingararbeiðið áðrenn Leirvík | 18,4 - - |

Tá ið raksturin hjá IRF ikki hevur kunnað borið rentu - og avdráttarbyrðuna av tí (ov) stóru lániskuldini hjá felagnum, hevur landsstýrið verið noytt at lagt út fyri rentur og avdrøg av lánunum. Higartil hevur landsstýrið lagt út 36,5 mió. kr., 29,75 mió. kr. fyri tað hálendska lánið, og 6,75 mió. kr. fyri DEM-lánið. Sambært viðtøkunum fyri IRF borga limakommununar fyri lánum hjá felagnum í mun til íbugvaratalið. Landsstýrið kundi sostatt kravt peningin innaftur frá hesum kommununum, men hetta er ikki gjørt enn. Tvinnar høvuðsgrundir eru fyri hesum.

Fyrieikingararbeiðið áðrenn Leirvík hevur í roknskapunum hjá IRF verið bókað sum aktiv, tí felagið hevur verið av tí áskoðan, at hetta eru útreiðslur, sum løgting og landsstýrið eiga at átaka sær vegna tær forðingar, sum vórðu lagdar IRF at sleppa í gongd. Hesar útr. verða sundurgreinaðar soleiðis:

| | |
|---|---|
| Entrprenørar | 5,0 mió. kr. |
| Upplýsing og kanningararbeiði | 2,5 - - |
| Samsýning og fundarp., sakførarakostn, fundarútr. v.m. | 1,5 - - |
| Rentuútr. | 25,0 - - |
| Tilsamans | 34,0 - - |
| Rentuinntøkur | -13,0 - - |
| Studningur | - 3,5 - - |
| Nettoútr. | 18,5 - - |

Uttan at fara inn á tað søguligu gongdina viðvíkjandi byggingini av brennistøðini hjá IRF, og uttan at taka støðu til møguliga ábyrgd, er tað greitt, at ein av grundunum til, at støðan hjá IRF er so vánalig, er júst tann, at felagið slapp ikki í gongd sum ætlað. Umframt omanfyri nevndu útreiðslur, ið stóðust av hesum, hevði felagið eisini stórt inntøkutap av tí sama. Felagið hevur á fleiri fundum og skrivum til hetta og undanfarin landsstýri gjørt vart við sína støðu, og heitt á landstýrið, um at yvirtaka skuld hjá IRF, soleiðis at tað verður møguligt við eini minni skuldarbyrðu at fáa raksturin at bera seg.

Av hesi grund, og av tí at fíggjarstøðan hjá kommununum er sera trupul, hevur landsstýrið higartil ikki kravt útlagda peningin innaftur frá limakommununum hjá IRF, men hevur ætlað at finna eina politiska loysn á spurninginum.

Eftir uppskotinum fær landsstýrið heimild at strika 33 mió. kr. av skuldini hjá IRF til landskassan. Hetta er eitt mett tal, men svarar nøkulunda til fammanfyri nevndu útreiðslur í sambandi við fyrireikingar áðrenn Leirvík + rentur av nevndu upphædd, og aðrar útreiðslur (mistar innntøkur), ið hava staðist av, at IRF ikki slapp í gongd sum ætla. Strikingin er treytað av, at javnvág fæst í raksturin, soleiðis at IRF framyvir sjálvt verður ført fyri at klára sínar skyldur mótvegis lángevarunum.

Hetta hevur við sær, at IRF skal lata landsstýrinum eina rakstrarætlan, og í tí sambandinum taka neyðugar avgerðir, sum vísir, at tað er sannlíkt, at treytin verður lokin. Sambært viðlagda uppskoti til rakstrarætlan (uppskot 1), verður neyðugt hjá IRF, fyri at lúka treytina, at hækka limagjaldið. Í 1994 verður tað hækkað til 950 kr. pr. íbúgva, í 1995 til 1.000 kr. pr. íbúgva o.s.fr. Eisini skal frá 1994 áleggjast eitt posagjald (10 kr./posan).

Verður treytin ikki lokin, t.v.s. um landsstýrið ikki fær nevndu rakstrarætlan, og verða neyðugar avgerðir av røttu mynduleikunum hjá IRF ikki tiknar í tí sambandinum, fellur tilsøgnin um at strika skuldina burtur, og verður útlagdi peningurin so kravdur innaftur eftir vanligum reglum.

Eftirgevingin av nevndu skuld hjá IRF til landskassan hevur ikki við sær, at likviditetur landkassans viknar av hesum, tí hetta er peningur, sum longu er lagdur út fyri landskassaveðhald fyri lán til IRF.

Landskassin hevur sum sagt, lagt út 36,5 mió. kr. fyri IRF. Um 33 mió. kr. verða strikaðar, eru eftir at gjalda 3,5 mió. kr. Haraftrat verður neyðugt hjá landskassanum at leggja út fyri tað hálendska lánið í tíðarskeiðinum 1993-1996, umleið 20,7 mió. kr. íroknað rentur. Eftir rakstrarætlanini verður samlaða upphæddin umleið 22 mió. kr. afturgoldin 1997-2001 við uml. 25,7 mió. kr., t.v.s. við rentum aftratløgdum.

Landsgrannskoðarin hevur gjørt ymiskar viðmerkingar til viðurskiftini hjá IRF. Hesi, sum eisini eru Fíggjarnevndini kunnug, eru viðgjørd á fundi hin 4. desember 1992 millum landsstýrið, IRF og Grannskoðaradeild Landskassans.

Westdeutche Landes Bank hevur boðið IRF endurfígging av DEM láninum svarandi til Dkr. 60 mió. Lánið verður avdrigið við 7,5 mió. kr. árliga frá mai 1994, og falla síðani 30 mió. kr. til gjaldingar í 1997. Hesar mugu so helst umfíggjast tá. Rentan verður LIBOR + 1,25%. Treytin er, at landskassin framhaldandi veðheldur fyri láninum og metir landsstýrið seg at hava heimild til tess sambært løgtingslóg nr. 29 frá 5. mai 1981.

## Álit

### í

*løgtingsmáli nr. 139/1992: Striking av skuld hjá Interkommunala Renovatiónsfelagsskapinum.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 16. mars 1993 og eftir 1. viðgerð tann 23. mars beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og ein samd nevnd mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

# 140. Løgtingslóg um hægri handilsútbúgving

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um hægri handilsútbúgving.*

*lagtingslov om højere handelsuddannelse.*

## 1. táttur
## Stevnumið

### § 1.

Landsstýrinum verður sbrt. § 2 í rammulóg nr. 54 frá 14. februar 1979 heimilað at skipa fyri hægri handilsútbúgving.

**Stk. 2.** Útbúgvingin verður skipað soleiðis, at hon veitir handilsgymnasialt støði undir framhaldandi og hægri útbúgving, og er við til at menna næmingarnar persónliga og geva teimum fatan av samfelagnum og menning tess við serligum denti á viðurskifti vinnulívsins.

### § 2.

Landsstýrið ásetir reglur um útbúgvingina sum heild.

### § 3.

Útbúgvingin fer fram á skúlum, sum landsstýrið góðkennir til hetta endamálið.

**Stk. 2.** Útbúgvingin verður skipað sum 3 ára skúlaundirvísing og er býtt í 2 partar, 1. part, sum er støðisárið innan fyrisiting, handil og skrivstovu, og 2. part, sum er ein 2 ára útbúgving til hægri handilsprógvtøku.

## Kapitel 1
## Formål

### § 1.

Landsstyret bemyndiges i henhold til § 2 i lov nr. 54 af 14. februar 1979 til at forestå højere handelsuddannelse.

**Stk. 2.** Uddannelsen tilrettelægges således, at den giver handelsgymnasialt grundlag for videregående og højere uddannelse og bidrager til elevernes personlige udvikling og til deres forståelse af samfundet og dets udvikling med særlig vægt på erhvervslivets forhold.

### § 2.

Landsstyret fastsætter de generelle regler for uddannelsen.

### § 3.

Uddannelsen foregår på skoler, som landsstyret har godkendt til formålet.

**Stk. 2.** Uddannelsen tilrettelægges som skoleundervisning i 3 år, og er delt i to dele: 1. del, som er grunduddannelse indenfor administration, handel og kontor, og 2. del, som er en 2 årig uddannelse til højere handelseksamen.

§ 4.

Stakgreinaundirvísing verður skipað sum undirvísing í støkum lærugreinum ella sum serligar skipaðar undirvísingargongdir. ið veita tilkomnum:

a) grundarlag fyri framhaldandi ella hægri útbúgving,
b) ískoyti til eina frammanundan lokna útbúgving ella
c) høvi til at bøta um møguleikarnar fyri starvi í vinnulívinum.

**Stk. 2.** Stakgreinaundirvísing kann verða sett saman til eina útbúgving av pørtum frá fleiri gymnasialum útbúgvingum. Landsstýrið ásetir gjøllari reglur um hetta.

§ 4.

Der tilrettelægges enkeltfagsundervisning som undervisning i enkelte fag eller som særligt tilrettelagte uddannelsesforløb, som giver voksne:

a) grundlag for videregående eller højere uddannelse,
b) supplering af tidligere afsluttet uddannelse eller
c) mulighed for at forbedre kvalifikationerne for arbejde i erhvervslivet.

**Stk. 2.** Enkeltfagsundervisning kan sammensættes til en uddannelse af dele fra flere gymnasiale uddannelser. Landsstyret fastsætter nærmere regler herom.

## 2. táttur
## Atgongd til útbúgvingina

## Kapitel 2
## Adgang til uddannelsen

§ 5.

Tann, sum hevur tikið støðisárið innan fyrisiting, handil og skrivstovu, kann verða tikin upp til 2. partin av útbúgvingini.

§ 5.

Den, der har taget grunduddannelsen inden for administration, handel og kontor kan optages i uddannelsens 2. del.

§ 6.

Næmingar, sum hava lokið fráfaringarroynd fólkaskúlans, verða tiknir upp eftir umsókn í útbúgvingina í tað í § 5 nevnda støðisárið, um upptøkuskúlin metir, at teir eru førir fyri at fylgja undirvísingini og fremja útbúgvingina í vanligu útbúgvingartíðini.

**Stk. 2.** Upptøkan til 2. partin av útbúgvingini er treytað av, at skúlin grundað á úrslitið í støðisárinum framvegis metir, at næmingurin er førur fyri at

§ 6.

Elever, der har afsluttet folkeskolens afgangsprøve, optages efter ansøgning i uddannelsen i den i § 5 nævnte grunduddannelse, hvis de efter optagelsesskolens vurdering forventes at kunne følge undervisningen og fuldføre uddannelsen på normal tid.

**Stk. 2.** Optagelsen til uddannelsens 2. del er betinget af, at skolen på grundlag af resultatet i grunduddannelsen fortsat forventer, at eleven er i stand til

fylgja og fremja útbúgvingina í vanligu útbúgvingartíðini.

**Stk. 3.** Næmingar, sum hava lokið støðisárið eftir stk. 1, kunnu velja at halda fram í yrkisútbúgving innan fyrisiting, handil og skrivstovu.

§ 7.

Næmingar, sum hava lokið støðisárið innan fyrisiting, handil og skrivstovu, ella sum hava í minsta lagi tilsvarandi førleika, kunnu takast upp eftir umsókn, um skúlin metir, at teir eru førir fyri at fylgja undirvísingini og fremja útbúgvingina í vanligu útbúgvingartíðini.

**Stk. 2.** Skúlin kann treyta upptøkuna av, at næmingurin tekur ávísar vællærugreinir ella tekur eykaundirvísing.

§ 8.

Landsstýrið tryggjar, at allir egnaðir næmingar eftir § 6, stk. 2, kunnu verða tiknir upp í útbúgvingina. Umsøkjarar, sum verða tiknir upp eftir § 6, stk. 2 og § 7 eru javnsettir.

**Stk. 2.** Landsstýrið ásetir gjøllari reglur um atgongu- og upptøkutreytir til útbúgvingina til støðisárið.

§ 9.

Umsøkjari verður tikin upp í tann skúla, sum hann ynskir, treytað av, at skúlin hevur pláss.

**Stk. 2.** Landsstýrið kann áseta reglur um samstarv millum skúlar um býtið av næmingum.

at følge og fuldføre uddannelsen på normal tid.

**Stk. 3.** Elever, der har gennemført grunduddannelsen efter stk. 1, kan vælge at fortsætte i erhvervsuddannelse inden for administration, handel og kontor.

§ 7.

Elever, der har gennemført grunduddannelsen inden for administration, handel og kontor, eller som har mindst tilsvarende kvalifikationer, optages efter ansøgning, hvis de efter skolens vurdering forventes at kunne følge undervisningen og fuldføre uddannelsen på normal tid.

**Stk. 2.** Skolen kan gøre optagelsen betinget af, at eleven følger bestemte valgfag eller gennemfører supplerende undervisning.

§ 8.

Landsstyret sikrer, at alle egnede elever efter § 6, stk. 2, optages i uddannelsen. Ansøgere, som optages efter § 6, stk. 2 og § 7 er ligestillede.

**Stk. 2.** Landsstyret fastsætter nærmere regler om adgangs- og optagelseskrav til uddannelsen til grunduddannelsen.

§ 9.

Ansøger optages på den skole, han ønsker, såfremt der er plads.

**Stk. 2.** Landsstyret kan fastsætte regler om samarbejde mellem skolerne om fordeling af eleverne.

**Stk. 3.** Landsstýrið kann í serligum føri áleggja einum skúla at seta útbúgvingina á stovn ella at taka upp eitt ávíst tal av næmingum.

## 3. táttur
## Innihaldið í útbúgvingini

### § 10.

Hægri handilsútbúgvingin innibeldur lærugreinir úr einari handilsgymnasialari lærugreinarøð, sum landsstýrið ásetir gjøllari reglur um, og møguligar lærugreinir frá øðrum gymnasialum útbúgvingum.

**Stk. 2.** Útbúgvingin verður samansett soleiðis, at umleið tveir triðingar av undirvísingini eru kravdar lærugreinir úr tí handilsgymnasialu lærugreinarøðini, meðan restin eru vallærugreinir.

**Stk. 3.** Ein stórur partur av lærugreinunum í tí handilsgymnasialu lærugreinarøðini verða skipaðar í stigum. Næmingarnir skulu í minsta lagi velja tvær lærugreinir á hástigi.

### § 11.

Tær kravdu lærugreinirnar eru lærugreinir úr tí handilsgymnasialu lærugreinarøðini.

**Stk. 2.** Vallærugreinirnar eru

a) lærugreinir, sum byggja á kravdar lærugreinir,
b) aðrar lærugreinir úr tí handilsgymnasialu lærugreinarøðini, og
c) lærugreinir, sum annars nøkta áhugamál og tørv næminganna.

**Stk. 3.** Næmingurin kann innan fyri tær í § 12, stk. 1 fastsettu reglur velja

**Stk. 3.** Landsstyret kan i særlige tilfælde pålægge en skole at etablere uddannelsen eller optage et bestemt antal elever.

## Kapitel 3
## Indholdet i uddannelsen

### § 10.

Højere handelsuddannelse indeholder fag fra en handelsgymnasial fagrække, som landsstyret fastsætter nærmere regler om, og eventuelle fag fra andre gymnasiale uddannelser.

**Stk. 2.** Uddannelsen sammensættes således, at omkring to trediedele af undervisningen er obligatoriske fag fra den handelsgymnasiale fagrække, mens resten er valgfag.

**Stk. 3.** En væsentlig del af fagene i den handelsgymnasiale fagrække er niveaudelte. Eleverne skal vælge mindst to fag på højt niveau.

### § 11.

De obligatoriske fag er fag fra den handelsgymnasiale fagrække.

**Stk. 2.** Valgfagene er:

a) fag, der er overbygningsfag på obligatoriske fag,
b) andre fag fra den handelsgymnasiale fagrække og
c) fag, som derudover tilgodeser elevernes interesser og behov.

**Stk. 3.** Eleven kan inden for de efter § 12, stk. 1, fastsatte regler vælge valg-

vallærugreinir í millum lærugreinir, sum verða skipaðar av øðrum gymnasialum undirvísingarstovnum.

**§ 12.**

Landsstýrið ásetir reglur um samansetingina av vallærugreinum, harundir, um næmingar, sum eru tiknir upp eftir § 6, stk. 1, skulu velja ávísar vallærugreinir í støðisárinum.

**Stk. 2.** Landsstýrið ásetir reglur um, at tann einstaki skúlin skal bjóða ávísar vallærugreinir til næmingar, sum eru tiknir upp til hægri handilsútbúgving.

**§ 13.**

Næmingum, sum hava tørv á tí, verður givin serundirvísing og annar sernámsfrøðiligur stuðul.

**Stk. 2.** Næmingum verða givin ráð og vegleiðing um útbúgvingar- og yrkisviðurskifti.

**Stk. 3.** Landsstýrið ásetir gjøllari reglur fyri tey í stk. 1 og 2 nevndu viðurskifti.

**4. táttur**
**Prógvtøka**

**§ 14.**

Næmingar, sum hava framt útbúgvingina, fara til hægri handilsprógvtøku.

**Stk. 2.** Landsstýrið ásetir reglur um hægri handilsprógvtøku, harundir um royndir, prógvtøkuuppgávur, prógvdómarar, prógvmet og prógvskjøl.

fag blandt fag, der tilbydes af andre gymnasiale uddannelsesinstitutioner.

**§ 12.**

Landsstyret fastsætter regler for sammensætningen af valgfag, herunder om hvorvidt elever, der er optaget efter § 6, stk. 1, skal vælge bestemte valgfag i grunduddannelsen.

**Stk. 2.** Landsstyret fastsætter regler om, at den enkelte skole skal tilbyde bestemte valgfag til elever, som er optager til højere handelsuddannelse.

**§ 13.**

Til elever, der har behov herfor, gives der specialundervisning og anden specialpædagogisk bistand.

**Stk. 2.** Der tilbydes eleverne råd og vejledning om uddannelses- og erhvervsforhold.

**Stk. 3.** Landsstyret fastsætter nærmere regler for de i stk. 1 og stk. 2 nævnte forhold.

**Kapitel 4**
**Eksamen**

**§ 14.**

Elever, der har gennemført uddannelsen, afslutter med højere handelseksamen.

**Stk. 2.** Landsstyret fastsætter regler om højere handelseksamen, herunder om prøver, eksamensopgaver, censorer, karakterer og eksamensbeviser.

## 5. táttur
## Fígging

### § 15.
Undirvísingarútreiðslurnar til útbúgvingina eftir hesi lóg verða útgoldnar eftir reglum, sum landsstýrið ásetir.

### § 16.
Undirvísingin er ókeypis.

**Stk. 2.** Føroya Landsstýri kann tó áseta reglur um næmingagjald fyri stakgreinaundirvísing.

## 6. táttur
## Aðrar ásetanir

### § 17.
Landsstýrið útvegar tær neyðugu góðkenningarnar av útbúgvingarstøðinum og tær neyðugu avtalurnar við onnur lond.

### § 18.
Ein treyt fyri góðkenning av undirvísingarførleika er, at lærarin hevur eina hóskandi útbúgving frá hægri lærustovni.

**Stk. 2.** Lærarar skulu í seinasta lagi 2 ár eftir starvssetan hava lokið eina av landsstýrinum góðkenda námsliga roynd. Landsstýrið kann í serligum førum gera undantak frá hesum kravi.

**Stk. 3.** Landsstýrið ásetir gjøllari reglur um undirvísingarførleika.

### § 19.
Landsstýrið ásetur reglur um kærur og umgerð av avgerðum í sambandi við

## Kapitel 5
## Finansiering

### § 15.
Undervisningsudgifterne til uddannelsen efter denne lov udbetales efter regler, som landsstyret fastsætter.

### § 16.
Undervisningen er vederlagsfri.

**Stk. 2.** Landsstyret kan dog fastsætte regler om elevgebyr for enkeltfagsundervisning.

## Kapitel 6
## Andre bestemmelser

### § 17.
Landsstyret tilvejebringer de nødvendige godkendelser af uddannelsesniveauet og træffer de nødvendige aftaler med andre lande.

### § 18.
En betingelse for godkendelse af undervisningskompetence er, at læreren har en relevant uddannelse fra en højere læreanstalt.

**Stk. 2.** Lærere skal senest 2 år efter ansættelsen have bestået en af landsstyret godkendt pædagogisk prøve. Landsstyret kan i særlige tilfælde gøre undtagelse fra dette krav.

**Stk. 3.** Landsstyret fastsætter nærmere regler om undervisningskompetence.

### § 19.
Landsstyret fastsætter regler om klage og omgørelse af afgørelser i forbindel-

prógtøkuna og aðrar avgerðir skúlans.

**§ 20.**

Landsstýrið kann í serligum førum víkja frá reglunum í hesi lóg við tí endamáli at fremja útbúgvingarroyndir.

**§ 21.**

Skúlin skal hava næmingarnar tryggjaðar móti skaðum, sum næmingunum kunnu verða fyri undir skúlagongdini.

## 7. táttur
## Gildisskipan

**§ 22.**

Henda lóg kemur í gildi 1. august 1993.

**Stk. 2.** Landsstýrið ásetir reglur um, hvussu lógin skal nýtast fyri tær útbúgvingar, sum eru byrjaðar, men ikki endaðar, áðrenn henda lógin kemur í gildi.

**Stk. 3.** Í ára skeið til hægri handilsprógtøku kann lesast eftir reglum, sum landsstýrið ásetir.

se med eksamen og andre afgørelser, der er truffet af skolen.

**§ 20.**

Landsstyret kan i særlige tilfælde gøre undtagelser fra loven med det formål at fremme uddannelsesforsøg.

**§ 21.**

Skolen skal have eleverne forsikret mod skader, som eleverne kan pådrage sig under skolegangen.

## Kapitel 7
## Ikrafttrædelse

**§ 22.**

Denne lov træder i kraft 1. august 1993.

**Stk. 2.** Landsstyret fastsætter regler om, hvorledes loven skal finde anvendelse for de uddannelser, som er påbegyndt, men ikke afsluttet, inden denne lov træder i kraft.

**Stk. 3.** I årigt kursus til højere handelseksamen kan læses efter regler, som landsstyret fastsætter.

**Viðmerkingar:**

Løgtingslóg nr. 49 frá 5. mai 1987 fevnir um grundútbúgving innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuøkið og fekk gildi 1. august 1986.

Á vári 1992 setti landsskúlastjórin eina nevnd, sum fekk til arbeiðssetning at dagføra FHS-útbúgvingina eftir frammanfyrinevndu løgtingslóg og IH-útbúgvingina, tað er hægri handilsútbúgvingina, sum higartil hevur verið skipað samsvarandi danskari lóggávu, sum ikki formliga er sett í gildi í Føroyum.

Landsskúlaráðið hevur á fundi 24. februar 1993 samtykt at mæla landsstýrinum til at leggja fyri løgtingið uppskot til løgtingslóg um hægri handilsútbúgving, sum er gjørt við støði í umrødda nevndararbeiði.

Vísandi til hetta og tær "Viðmerkingar" til løgtingslógaruppskotið, sum landsskúlafyrisitingin hevur gjørt, og sum eru hjálagdar sum skjal, og við teirri upp-

lýsing, at landsstýrið hevur gjørt ávísar smærri broytingar í nevnda løgtingslógaruppskoti, leggur landsstýrið við hesum uppskot til løgtingslóg um hægri handilsútbúgving fyri løgtingið.

## Álit

í

*løgtingsmáli nr. 140/1992: Løgtingslóg um hægri handilsútbúgving.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 16. mars 1993 og eftir 1. viðgerð tann 29. mars beint í mentannar- og skúlanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, sum er ein dagføring av FHS-útbúgvingini og HH- útbúgvingini, so sum ein nevnd, sett av landsskúlafyrisitingini, hevur skotið upp, og sum landsskúlaráðið hevur samtykt.

Talan er um eina útbúgving, ið veitir handilsgymnasialt støði undir framhaldandi og hægri útbúgving, sum landsstýrið ásetir nærri reglur um. Útbúgvingin verður skipað sum 3 ára skúlaundirvísing, sum er býtt í tveir partar. Ein fyrra part, sum er støðisár innan fyrisiting, handil og skrivstovu, og ein seinna part, sum er ein 2 ára útbúgving til hægri handilsprógvtøku.

Atgongd til 2 ára útbúgvingina til hægri handilsprógvtøku hava teir næmingar, sum hava tikið støðisárið, og sum av skúlanum vera hildnir skikkaðir at halda fram. Næmingar, sum hava tikið støðisárið kunna eisini halda fram í yrkisútbúgving innan fyrisiting, handil og skrivstovu.

Tað er landsstýrið, sum góðkennir skúlar og undirvísingarliga innihaldið í útbúgvingini, men hildið verður ikki, at neyðugt er við einum yvirskipaðum gymnasialum ráði, so sum skotið er upp í viðmerkingunum til § 2, síðu 5. Landsstýrið tryggjar, at egnaðir næmingar verða tiknir upp í útbúgvingina og ásetir gjøllari reglur um atgongu- og upptøkutreytir, eins og landsstýrið ásetir gjøllari reglur um lærugreinavavið og samansetingina.

Teir næmingar, sum hava framt útbúgvingina, fara til hægri handilsprógvtøku, eftir reglum ásettum av landsstýrinum.

Hildið verður rímiligt, at lærarar, ið geva frálæru við hesa útbúgving, hava lokið eina av landsstýrinum góðkenda námsliga roynd, so sum uppskotið sigur, meðan tað ikki verður hildið rímiligt, at vikið verður frá hesi reglu.

Ein samd nevnd mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins við hesum:

## broytingaruppskot

## til

## uppskot landsstýrisins

| | |
|---|---|
| § 18 stk. 2, 2. pkt. verður strikað. | § 18 stk. 2, 2. pkt. udgår. |

# 141. Løgtingslóg um útreiðslur til sjúkrakassarnar til heilivág og afturbering landskassans

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um útreiðslur til sjúkrakassarnar til heilivág og afturbering landskassans.*

*lagtingslov om sygekassernes udgifter til medicin og refusion fra landskassen.*

§ 1.

Sjúkrakassin rindar njótandi limunum 75% av útreiðslunum til heilivág, fyriskipað av lækna (ella tannlækna í tann mun, hesin eigur at fyriskipa heilivág á forskrifti), og sum er upptikið á skrá yvir heilivágssløg, ið landsstýrið kunnger, ið henda áseting fevnir um. Ásetast kann, at gjald sjúkrakassans av 75% av útreiðslunum til ávís sløg av heilivági verður fyriskipað til ávísar sjúkur.

§ 1.

Sygekassen afholder til nydende medlemmer 75% af udgifter til lægemidler, som er ordineret af lægen (eller af tandlægen i det omfang, denne har ret til ved recept at ordinere lægemidler), og som er optaget på en af landsstyret udsendt fortegnelse over lægemidler, der omfattes af denne bestemmelse. Det kan i fortegnelsen bestemmes, at sygekassens afholdelse af 75% af udgiften til visse arter af lægemidler ordineres til bestemte sygdomme.

Stk. 2. Sjúkrakassin rindar njótandi limum 50% av útreiðslunum til heilivág, fyriskipað av lækna (ella av tannlækna í tann mun, hesin hevur rætt til at fyriskipa heilivág á forskrifti), og sum er upptikið á skrá yvir heilivágssløg, ið landsstýrið kunnger, ið henda áseting fevnir um. Ásetast kann, at gjald sjúkrakassans av 50% av útreiðslunum til ávís heilivágssløg er treytað av, at heilivágur verður fyriskipaður til ávísar sjúkur.

Stk. 2. Sygekassen afholder til nydende medlemmer 50% af udgiften til lægemidler, som er ordineret af lægen (eller af tandlægen i det omfang, denne har ret til ved recept at ordinere lægemidler), og som er optaget på en af landsstyret udsendt fortegnelse over lægemidler, som omfattes af denne bestemmelse. Det kan i fortegnelsen bestemmes, at sygekassens afholdelse af 50% af udgiften til visse arter af lægemidler er betinget af, at lægemidlet ordineres til bestemte sygdomme.

**Stk. 3.** Sjúkrakassin rindar njótandi limum 50% ella 75% av útreiðslunum til heilivág, ið útflýggjast kann uttan fyriskipan av lækna, og sum er upptikið á skrá, ið landsstýrið kunngjer, um so er, at læknin ella tannlæknin um hesi heilivágsløg á forskriftini hevur viðmerkt at vera ætlað fólka- ella avlanispensionisti ella fólki, sum hava varandi mein, ið krevur framhaldandi viðgerð við einum av hesum heilivágssløgum.

**Stk. 4.** Ásetanirnar í stk. 1-3 um tilskot til heilivág fevnir eisini um útreiðslur til sending av heilivági.

**Stk. 5.** Ásetanirnar í stk. 1-3 um tilskot til heilivág eru eisini galdandi, um heilivágur er keyptur í einum øðrum norðurlandi enn har, hann er fyriskipaður.

**Stk. 6.** Heilsustýrið er ráðgevi landsstýrisins viðvíkjandi gerð av teimum í stk. 1-3 umrøddu skráum.

**§ 2.**

Landsstýrið ásetir í kunngerð nærri reglur samb. § 1.

**§ 3.**

Landsstýrið ásetir í kunngerð nærri reglur um afturbering landskassans til teir góðkendu sjúkrakassarnar viðvíkjandi útreiðslum sjúkrakassanna til heilivág til limabólkar A og B.

**§ 4.**

Í lov nr. 514 af 21. juli 1989 for Færøerne om den offentlige sygeforsikring setast úr gildi § 13 og § 27, stk. 2, nr. 3 og 4, sambært lógarinnar § 40 a, í sambandi við ígildissetan av hesari lóg.

**Stk. 3.** Sygekassen afholder til nydende medlemmer 50% eller 75% af udgiften til lægemidler, der kan udleveres uden lægeordination, og som er optaget på en af landsstyret udsendt fortegnelse, såfremt de pågældende lægemidler ved lægens eller tandlægens ordination angives som bestemt til folke- eller invalidepensionister eller til personer, der lider af en varig lidelse, der kræver fortsat behandlig med et af de pågældende lægemidler.

**Stk. 4.** Bestemmelserne i 1-3 omfatter tillige udgifterne ved forsendelsen af lægemidlerne.

**Stk. 5.** Bestemmelserne i stk. 1-3 om tilskud til lægemidler gælder også, når lægemidlet er indkøbt i et andet nordisk land end det, i hvilket det er ordineret.

**Stk. 6.** Sundhedsstyrelsen rådgiver landsstyret vedrørende udarbejdelse af de i stk. 1-3 omhandlede fortegnelser.

**§ 2.**

Landsstyret fastsætter nærmere bestemmelser jfr. § 1.

**§ 3.**

Landsstyret fastsætter nærmere bestemmelser om landskassens tilskud til de anerkendte sygekasser, for så vidt angår sygekassens udgifter til lægemidler til medlemsgruppe A og B.

**§ 4.**

I lov nr. 514 af 21. juli 1989 for Færøerne om den offentlige sygeforsikring ophæves § 13 og § 27, stk. 2, nr. 3 og 4, jfr. lovens § 40 a, i forbindelse med ikrafttrædelse af denne lov.

**Stk. 2.** Landsstýrið ásetir í kunngerð nærri reglur viðvíkjandi ígildissetan av hesari lóg sambært stk. 1.

**Stk. 2.** Landsstyret fastsætter nærmere bestemmelser om lovens ikrafttrædelse, jfr. stk. 1.

**Viðmerkingar:**

Av útreiðslum sjúkrakassans eru serliga útreiðslurnar til heilivág hækkaðar rættiliga nógv seinastu árini orsakað av príshækkingum og meirnýtslu. Hetta hevur so eisini merkt, at studningurin úr landskassanum eftir galdandi lóggávu er tilsvarandi hækkaður.

Á løgtingsfíggjarlógini fyri 1993 er játtanin viðvíkjandi studningi til sjúkrakassarnar 15 mió. kr., og er hetta útgangsstøðið undir broytingunum í studningsskipanini skotið upp í hesum lógaruppskoti.

Undir øllum umstøðum er tað tó rímiligt nú at endurskoða studningsskipanina til heilivág, sum gjørt er aðrastaðni, eitt nú í Danmark. Hetta millum annað eisini fyri at tálma (yvir)- nýtsluna av heilivági.

Í hesum sambandi er arbeiðsbólkur við umboðum frá sjúkrakassunum, apotekunum, apoteksverkinum, almannaverkinum og landsstýrinum settur at finna fram til møguleikar fyri sparingum við atliti til uppbýti og umbýti av stuðulsprosentsatsinum, "800 kr.- reglan" ella líknandi. Sjúkrakassarnir hava ikki kunnað tikið undir við at seta "800 kr.-regluna" í verk, men hava umboðini í arbeiðsbólkinum nú verið samd um, at skilagóð loysn er at fremja skipan eftir danskari fyrimynd.

Ætlan landsstýrisins er at fáa framt minni lógarbroytingar í lov nr. 514 af 21. juli 1989 for Færøerne om den offentlige sygeforsikring, ið heimilar landsstýrinum at seta í gildi kunngerð samsvarandi Bekendtgørelse nr. 880 af 17. december 1991 af fortegnelse over lægemidler, der er tilskudsberettigede efter sygesikringsloven, og við tveimum studningssatsum.

Sambært § 13 í sjúkratryggingarlógini skal sjúkrakassin gjalda njótandi limum 75% av útreiðslunum til heilivág. Í "donsku skipanini" hevur verið nýtt ávikavist 50% og 75% í studningssatsum.

Skráin yvir heilivágssløg, sum eru heimilað tilskot, er býtt upp í tveir bólkar. Í bólki II í skránni (50% í tilskoti) verða upptikin heilivágssløg, ið við vissu hava viðgerðarliga virkan, og har ikki er vandi fyri óynsktari ovurnýtslu. Í bólki I í skránni verða upptikin heilivágssløg, ið hartil oftast verða nýtt til viðgerð av serligum sjúkum, og oftast lívshóttandi sjúkum. Henda skrá verður dagførd so hvørt.

Skráin, ið higartil er nýtt í Føroyum, er danska skráin frá 1981. Í donsku skránni frá 1991 er nógv minkað um talið av studningsskyldugum heilivági.

Uppskot til lógarbroytingar verður lagt fram sum uppskot til løgtingslóg soleiðis, at ætlanin er, at tær tilsvarandi lógarásetingarnar falla burtur í sjúkratrygg-

ingarlógini (§ 13 viðvíkjandi útreiðslum sjúkrakassanna til heilivág, og § 27, stk. 2, nr. 3 og 4 um afturbering landskassans til sjúkarkassarnar viðvíkjandi útreiðslum til heilivág).

Við studningssatsum uppá ávikavist 75% og 50%, við dagførdari skrá yvir heilivágssløg samsvarandi "donsku skipanini", og eini afturbering frá landskassanum til sjúkrakassarnar upp á 24% ímóti núverandi studningi upp á 25%, verður landskassastudningurin uml. 3 mió. kr. minni árliga (tó er roknað við 100% afturbering viðvíkjandi útreiðslum til insulinbúningar).

Tilsvarandi minka útreiðslur sjúkrakassanna undir hesum fyritreytum við uml. 700.000 kr. árliga (26 kr. fyri hvønn limin).

Avleiðingin er tó, at brúkarin harafturímóti skal gjalda 3,8 mió. kr. árliga í meirkostnaði fyri heilivág (15 kr. fyri hvønn pakka).

Grundarlagið undir hesum útrokningum er í mun til skipanina í dag og nýtslu·na í 1991, og hartil eru útreiðslurnar til MVG íroknaðar meirkostnaðinum.

Í mun til meirkostnað brúkaranna til heilivág ætlar landsstýrið at endurskoða kunngerðina um vinningsásetan av heilivági, og soleiðis møguliga partvís kompensera hesa hækking í brúkaragjaldinum.

Afturat sparingum sambært hesum lógaruppskoti er ætlan landsstýrisins at seta kunngerð í gildi viðvíkjandi forskriftum eina skipan soleiðis at apotekið flýggjar út bíligasta heilivágin, sum er synonymt við bílagda heilivágin.

Sambært § 40 a í sjúkratryggingarlógini krevst játtan frá danska heilsumálaráðharranum at avtaka tilsvarandi lógarásetingar í sjúkratryggingarlógini í sambandi við ígildissetan av løgtingslóg.

**Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar.**

**Ad § 1, stk. 1.**
Ásettar verða útreiðslur sjúkrakassans at gjalda njótandi limum útreiðslur til heilivágssløg, ið verða upptikin á skrá, ið landsstýrið kunnger, og sum við vissu hava viðgerðarliga virkan, at har ikki er vandi fyri óynsktari ovurnýtslu, og hartil verða nýtt til viðgerð av serligum og oftast lívshóttandi sjúkum.

**Ad § 1, stk. 2.**
Ásettar verða útreiðslur sjúkrakassans at gjalda njótandi limum av útreiðslum til heilivág, ið verða upptikin á skrá, ið landsstýrið kunnger, og sum við vissu hava viðgerðarliga virkan, og har ikki er vandi fyri óynsktari ovurnýtslu.

**Ad § 1, stk. 3.**
Ásettar verða útreiðslur sjúkrakassans at gjalda njótandi limum, sum eru fólka- ella avlamispensionistar, ella sum hava varandi mein, ið krevur framhaldandi viðgerð, av útreiðslunum til heilivágssløg sambært stk. 1 og 2, soleiðis at við-

merkt verður á forskriftini, at tað er ætlað fólka- ella avlamispensionistum ella fólki við varandi mein, ið krevur framhaldandi viðgerð við eitt av hesum heilivágssløgum.

**Ad § 2.**
Ásett verður at heimila landsstýrinum at áseta nærri reglur í kunngerð av skrá yvir heilivágssløg, sum verða heimilað tilskot eftir hesari lóg.

**Ad § 3.**
Ásett verður at heimila landsstýrinum at áseta í kunngerð satsin fyri afturbering landskassans til sjúkrakassarnar av útreiðslum teirra til heilivág til limabólkarnar A og B.

**Ad § 4.**
Sambært lov nr. 514 af 21 juli 1989 for Færøerne om den offentlige sygeforsikring, lógarinnar § 40a, kann heilsumálaráðharrin avtala ásetingar í lógina í samband við ígildisseting av løgtingslóg við ásetingum, ið ætlaðir eru at koma í staðin fyri ásetingar í sjúkratryggingarlógini.

Ásett verður, at landsstýrið í sambandi við, at heilsumálaráðharrin avtekur ásetingarnar í § 13 og § 27, stk. 2, nr. 3 og 4, verður heimilað at áseta í kunngerð ígildisseting av hesi lóg.

## Álit

í

*løgtingsmáli nr. 141/1992: Løgtingslóg um útreiðslur til sjúkrakassarnar til heilivág og afturbering til landskassan.*

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 16. mars 1993 og eftir 1. viðgerð tann 26. mars 1993 beint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur havt fund við umboð fyri Meginfelag Sjúkrakassa Føroya, Havnar Sjúkrakassa, Føroya Landsstýri, Almanna- og heilsudeildina.

Við teimum fyrimunum, ið sjúkrakassarnir fáa við uppskotnu broytingum í gjaldi fyri heilivág, har prosentupphæddin nú verður lækkað til ávikavist 50% og 75% saman við eini hækking í C-limagjaldinum, gevur hetta munandi bata fyri raksturin hjá sjúkrakassunum. Eisini er boðað frá, at landsstýrið vil áleggja apotekunum eina prislækking upp á umleið 5 mió. kr. fyri gjald av heilivági, og skuldi hetta tá stuðlað brúkaran eins væl og sjúkrakassunum.

Ein samd nevnd mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

# 142. Løgtingslóg um íløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um íløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir.*

*lagtingslov om emballage til øl, mineralvand og færdige læskedrikke.*

**§ 1.**

Henda lóg fevnir um íløt til øl, mineralvatn og aðrar lidnar leskidrykkir.

**§ 1.**

Denne lov omfatter emballage til øl, mineralvatn og andre færdige læskedrikke.

**§ 2.**

Loyvt er ikki at flyta inn ella at selja øl, mineralvatn ella aðrar lidnar leskidrykkir í eingangsíløtum.

**2. stk.** Ásetingin í 1. stk. fevnir tó ikki um innflutning og sølu av lidnum leskidrykkjum í pappíløtum.

**3. stk.** Landsstýrið kann geva loyvi til innflutning av leskidrykkjum í eingangsíløtum úr endurvinningartilfari.

**§ 2.**

Det er ikke tilladt at indføre eller sælge øl, mineralvand eller andre færdige læskedrikke i engangsemballage.

**Stk. 2.** Bestemmelsen i stk. 1 omfatter dog ikke indførsel og salg af færdige læskedrikke i emballage fremstillet af pap.

**Stk. 3.** Landsstyret kan give tilladelse til import af læskedrikke i engangsemballage af genbrugsmateriale.

**§ 3.**

Framleiðarar/innflytarar av teimum í § 1 nevndu vørum skulu prógva, at ein innsavningar- og aftursendingarskipan er, sum tryggjar, at íløtini verða send vøruframleiðaranum aftur.

**§ 3.**

Producenter/importører af de i § 1 nævnte varer skal bevise, at indsamlings- og returordning er til stede som sikrer, at emballagen bliver returneret til vareproducenten.

**§ 4.**

Landsstýrið kann seta í verk reglur fyri pantskipanum fyri íløt til tær í § 1 nevndu drekkavørur og kann áseta støddina á pantinum.

**§ 4.**

Landsstyret kan iværksætte regler om pantordninger for emballage til de i § 1 nævnte drikkevarer og kan fastsætte pantets størrelse.

§ 5.

Brot á hesa lóg verða sektað og hald verður lagt á ólógliga innfluttu ella seldu vøruna í nevndu fløtum.

§ 5.

Overtrædelse af denne lov straffes med bøde, og de ulovligt indførte eller solgte varer i den nævnte emballage konfiskeres.

§ 6.

Henda lóg kemur í gildi 1. august 1993. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 79 frá 27. juli 1989 um forboð móti innflutningi og sølu av øli, mineralvatni o.ø. lidnum leskidrykkjum í dósum og eingangsfløskum.

§ 6.

Denne lov træder i kraft 1. august 1993. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 79 fra 27. juli 1989 om forbud mod indførsel og salg af øl, mineralvand o.a. færdige læskedrikke i dåser og engangsflasker.

**Viðmerkingar:**

Tættari handilssamband við fleiri grannalond og broytingar í marknaðarføring av serliga mineralvatni og leskidrykkjum føra við sær, at landsstýrið av umhvørvisávum setir fram uppskot um at endurmýggja lógina fyri fløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir.

Sum kunnugt var bann ímóti innflutningi og sølu av øli, mineralvatni og øðrum evnum í stubbafløskum sett í gildi 15. juli 1972 við lóg nr. 32 frá 1. juni 1972. Grundgevingin var, at burturkastingin av stubbafløskum dálkaði náttúruna í slíkan mun, at neyðugt var, at forboðsregla fyri innflutningi av stubbafløskum varð sett í gildi.

Lógin er síðani endurmýggjað, fyrstu ferð við lóg nr. 45 frá 24. mai 1974, tá orðingin gjørdist einbrúksíløt, og síðan við núgaldandi lóg nr. 79 frá 27. juli 1989, har umframt øl og mineralvatn, eisini varð sett forboð ímóti innflutningi og sølu av leskidrykkjum í dósum og eingangsfløskum.

Andin í lógini samsvarar væl við støðugt harðnandi rákið í altjóða umhvørvispolitikki, nevniliga at framleiðarin av øli og leskidrykkjum (og innflytarin hansara vegna) skal reika so fyri, at íløtini koma aftur til framleiðaran, annaðhvørt til beinleiðis endurnýtslu ella til góðkenda burturbeining í heimlandinum.

Soleiðis, sum handilsmynstrið var fram til 1990'ini, hava nevndu lógir saman við fløskugjaldinum tryggjað okkum eina vælvirkandi endurnýtsluskipan fyri fløskur til mineralvatn og øl, so næstan hvør fløska verður latin bryggjaríunum aftur, har tær verða vaskaðar og endurfyltar. Innflutningurin av øli og mineralvatni hevur fyri tað mesta verið úr Danmark, og føroysku bryggjaríini hava kunna tikið ímóti teimum tómu fløskunum frá smáinnflytarunum. Treytirnar í Danmark eru rættiliga líkar okkara.

Seinnu árini er støðan heilt broytt. Nú gerst alt meira vanligt at selja mineralvatn og leskidrykkir í stórum fløskum ella dunkum. Hesi íløt eru ofta úr plastikki og ofta ikki ætlað til endumýtslu.

Brúkaramir hava tikið væl í móti hesum nýggju íløtunum, og tey eru sostatt helst komin fyri at vera. Neyðugt er nú at tryggja, at verandi aftursendingarskipanir ikki vera oyðilagdar av broytta mynstrinum, tí hetta hevði verið til stóran skaða fyri umhvørvið.

Til ber at halda fast við høvuðsregluna í galdandi lóg, nevniliga forboðið móti eingangsíløtum, uttan at hetta verður forboð móti plastfløskunum.

Umframt góðar endurnýtslufløskur úr plastikki finnast eisini sterkar fløskur úr endurvinningartilfari í handlunum. Sambært lógaruppskotinum (§ 2, 3. stk.) fær landsstýrið heimild at geva undantaksloyvi til innflutning av eingangsfløskum úr endurvinningartilfari, men landsstýrið fær eisini møguleika at banna ella avmarka innflutning av slíkum endurvinningarfløskum, um náttúrudálking stendst av hesum.

Alneyðugt er, at landsstýrið fær heimild at áleggja framleiðarum og innflytarum av hesum drykkjuvørum innsavningar- og pantiskipanir, sum tryggja, at fløtini ikki órudda í fjøru, bø ella haga, men koma aftur til teirra, sum hava innflutt ella framleitt drykkjuvørumar.

Hesa heimildina átti landsstýrið ikki sambært lógini frá 1989; men við nýggju lógini verður heimildin givin sambært §§ 3 og 4.

Við atliti til handilssáttmálunum, ið gjørdir eru millum Føroyar, EF og EFTA-lond skulu somu reglur galda fyri føroyska framleiðslu, sum fyri innflutning. Tann treytin verður lokin við hesum lógaruppskoti.

Lagt kann verða aftrat, at Rúsdrekkasøla Landsins fyrireikar aftursendingarskipan og pantiskipan fyri vín- og brennivínsfløskur, so hesar verða afturtiknar og síðani fluttar av landinum. Neyðugt skuldi ikki verið við lóggávu í tí sambandinum, tí Rúsdrekkasølan er einasti stórinnflytarin, sum helst eisini fer at taka ímóti teimum fløskum, ið ferðafólk hava við sær.

Víst verður annars til serligu viðmerkingarnar.

**Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:**

**Viðv. § 2 - Allýsingar:**

| | |
|---|---|
| *Endurnýtslufløska/ílat:* | Fløska/ílat, sum verður nýtt fleiri ferðir, t.v.s. verður send aftur til framleiðara til endurfylling. |
| *Endurvinningarfl./ílat:* | Fløska/ílat, sum aftan á nýtslu verður nýtt til annað endamál enn tað upprunaliga, t.d. sum nýggj plastrávøra. |

*Eingangsfløska/ílat:* Fløska/ílat, sum bert einaferð verður nýtt til upprunaliga endamálið.

**Viðv. § 2, 2. stk.:**

Talan er her um eina undantaksreglu fyri innflutning og sølu av lidnum leskidrykkjum, eitt nú mjólk og sodavatn, sum eru í pappíløtum.

**Viðv. § 4:**

Núverandi pantskipan fyri øl- og sodavatnsfløskur er sjálvboðin skipan, sum føroysku framleiðararnir og innflytararnir hava sett í verk. Henda skipan hevur virkað væl og kunnu slíkar skipanir framvegis vera sjálvbodnar. Við einum vaksandi tali av ymiskum fløskum á føroyska marknaðinum heldur Føroya Landsstýri tað tó verða neyðugt, at landsstýrið fær neyðugar heimildir til at tryggja, at innsavningar- og aftursendingarskipanirnar eisini fara at virka fyri onnur íløt framyvir.

Pantupphæddin eigur at verða uppkravd í øllum liðum frá framleiðara/innflytara til endaliga brúkaran, og eigur at verða ásett við atliti til faktiska virðið á íløtunum, men so mikið høgt, at íløtini veruliga verða send framleiðaranum aftur.

# 143. Broyting í løgtingslóg um fiskiveiðu á landleiðini

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fiskiveiðu á landleiðini.*

*lagtingslov om ændring i lagtingslov om fiskeri på fiskeriterritoriet.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 8 frá 29. mars 1978 um fiskiveiðu á landleiðini við seinni broytingum verður gjørd henda broyting:

Í § 4 verður sett sum nýtt stk. 3:

"Tá leiðir, sum hava verið friðaðar fyri øllum reiðskapi, verða opnaðar aftur fyri fiskiskapi, skal húkaveiða sleppa at royna fyrst. Hetta er eisini gald-

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 8 af 29. marts 1978 om fiskeri på fiskeriterritoriet med senere ændringer foretages følgende ændring:

Til § 4 tilføjes som nyt stk. 3:

"Når områder, som har været fredet for al redskab, åbnes igen for fiskeri, skal krogfiskeri tillades først. Dette er også gældende for 7 dagesfredning. Landsstyret fastsætter nærmere regler

andi fyri 7 dagafriðing. Landsstýrið ger reglur hesum viðvíkjani sambært § 4, stk. 1."

vedrørende denne i henhold til § 4, stk. 1."

**§ 2.**

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

**Viðmerkingar:**

Tað er meir og meir vanligt at seta tíðaravmarkað veiðubann fyri øllum reiðskapi. Sum dømi kunnu vit nevna 7 dagafriðingarnar. Tað er heilt órímiligt at seta veiðubann fyri øllum reiðskapi, um fiskurin er smáttfallandi og so aftaná 7 dagar at sleppa einari heilari gongu av partrolarum inn á sama øki. Hetta er tað sama sum at reka til spekingar fyri trolinum. Um tað er nakað, sum kann gera, at grunnurin verður steinoyðin, so er tað ein slíkur framgangsháttur, og hetta verður á fakmáli kallað fyri stovnsrøkt.

Tað, sum er nakað nýtt seinastu tvey árini, er, at gýtingarleiðirnar nú eru stongdar fyri øllum reiðskapi. Hetta ger, at tað bert eru trolaramir, sum fáa fyrimun, tá stongdar leiðir verða opnaðar aftur fyri fiskiskapi. Allir fiskimenn vita, hvussu stórau týdning tað hevur at vera fyrstur at seta aftan á eina uppløgu. Tað sama er sjálvandi galdandi fyri snelluna. Tað, sum umræður, er at vera fyrstur at kasta aftaná, at økið hevur fingið frið í styttri ella longri tíð.

Tað er av alra størsta týdningi, at teir, sum fyriskipa veiðu á Føroyagrunninum, kalla eitt trol fyri eitt trol, sum hevur túsundtals hestakreftir frammanfyri sær, og somuleiðis kalla ein húk fyri ein húk, um tað er snella ella snøri, so hesin reiðskapur fiskar í longsta lagi tað ljósa á degnum, meðan lína fiskar ein hálvan til tveir tímar í hvørji setu. Um tað er ein útróðrarbátur, so hevur hesin 80 til 100 veiðudagar um árið, meðan trolarin hevur 280 til 300 veiðudagar.

So leingi tað verður av fiskifrøðingum og øðrum hildið fast við, at tað ger tað sama, hvussu fiskað verður, er ikki bót á borði.

Tað, at trolarar eru og verða verandi, verða vit noyddir at liva við, men at landsstýrið skal skipa soleiðis fyri, at hesir somu trolarar verða brúktir til at forkoma húkaveiðuni og fiskastovnunum, sum eru okkara einasta náttúrugivna tilverugrundarlag (lívsgrundarlag), hetta er átaluvert. Út frá hesum viðmerkingum verður hetta uppskotið sett fram, henda lógarbroyting, sum kemur at tryggja húkinum somu rættindi sum trolinum.

# 144. Samráðingar við ríkisstjórnina

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið samtykkir at seta eina nevnd at taka upp samráðingar alt fyri eitt við ríkisstjórnina um hesi mál:

1) Allur avgerðarrættur í Føroyum, inneftir og úteftir, og allar skyldur skulu í framtíðini liggja hjá Føroya fólki, hjá tí fólkavalda løgtinginum og hjá løgtingsins umsitingarvaldi.
2) Avtala verður gjørd um at avgreiða fíggjar- og búskaparviðurskiftini landanna millum. Henda avtala eigur at skapa møguleikar fyri, at føroyska samfelagið kann fóta sær aftur fíggjar- og búskaparliga, samstundis sum hon eftir rímiligari tíð sleppur ríkiskassanum undan at lata føroyska samfelagnum árligan fíggjarliga stuðul.
3) Avtala verður gjørd um framtíðar samvinnu landanna millum á ymiskum økjum, eitt nú útbúgvingarliga og heilsuliga. Henda avtala eigur eisini at tryggja best møgulig viðurskifti millum fólkini í báðum londunum og tey mongu ættarbond, sum eru knýtt millum einstaklingar í báðum londum.

**Viðmerkingar:**

Tey fíggjarligu og búskaparligu viðurskiftini í Føroyum eru út av lagi vánalig og fólksins kor ótolandi og versnandi. Dag um dag frætta vit um vinnuvirki á landi og sjógvi, sum halda uppat, samstundis sum arbeiðsloysið alsamt veksur, og fólk í stórum tali flytir av landinum.

Onki bendir á, at viðurskiftini fara at broytast til tað betra í bræði, um ikki heilt týðandi, nýskapandi stig verða tikin. Landsins ráðandi myndugleikar hótta við hægri skatti, hægri meirvirðisgjaldi, hægri brúkaragjøldum, lægri lønum og lægri rentufrádrátti.

Hjá mongum eru byrðarnar longu so tungar, at tað knógvast ikki undir teimum, og fleiri byrðar, saman við lægri løn kunnu ikki annað enn taka botnin undan bæði einstaklinga- og landshúsarhaldinum.

Tann skipan Danmarkar og Føroya ímillum, sum varð sett í gildi í 1948 undir heitinum heimastýrisskipanin - og sum varð framd móti fólksins vilja - er farin av knóranum. Tá saman um kom, royndist henda skipan ikki øðrvísi enn mangir vísir menn spáddu longu tá - hon fór at roynast Føroya fólki ein vanlukkuskipan.

Í dag hava danir ásannað, at henda skipan virkar ikki. Tí hevur danska ríkisstjórnin í roynd og veru tikið hesa skipan av við beinleiðis at leggja seg út í stýringina av teimum málsøkjum, sum skuldu hoyra undir føroyskt lóggávu- og umsitingarvald. Henda flytingin av lóggávu- og umsitingarvaldi yvir ávísum málsøkjum frá donskum til føroyskar myndugleikar skuldi vera hornasteinurin í skipanini.

Formliga er henda skipan framvegis í gildi, men ikki reelt. Í dag kunnu hvørki løgting ella landsstýri føra annan politikk enn tann, sum danska stjórnin stingur út í kortið og góðtekur.

Tjóðveldisflokkurin skjýtur tí upp, at Løgtingið velur eina nevnd at samráðast við donsku stjórnina um nýskipanir á øllum økjum, bæði Føroya fólki og danska fólkinum at frama.

## Álit

### í

*løgtingsmáli nr. 144/1992: Samráðingar við ríkisstjórnina.*

Málið er lagt fram av Tjóðveldisflokkinum tann 16. mars 1993 og eftir 1. viðgerð tann 26. mars 1993 beint í marknaðarnevndina.

Ein meiriluti (Hergeir Nielsen, Sverre Midjord, Sommer Winther, Helena Dam á Neystabø, Olaf Olsen og Birgir Danielsen) hevur hesar viðmerkingar.

Síðani uppskot Tjóðveldisfloksins kom fram og fekk 1. viðgerð, er onnur samgonga skipað. Henda samgonga, sum uppskotsstillarin er partur av, sigur í samstarvsavtalu síni at: "Stýrisskipanin verður broytt við støði í álitinum, sum nevndin, ið er sett at kanna stýrisskipanina, leggur fram í seinasta lagi 1. oktober 1993. Ríkisrættarligu viðurskiftini Danmarkar og Føroya millum verða broytt, so at føroyingar fáa fult lóggávu- og umsitingarvald yvir samfelagnum."

Hildið verður, at henda orðing røkkur rættiliga langt, og mælir tí meirilutin til at senda uppskot Tjóðveldisfloksins til landsstýrið, so at hetta uppskot kann verða partur av víðari samráðingunum við ríkisstjórnina um stjórnarskipanarligu viðurskifti okkara.

Nevndi meiriluti setir tí fram soljóðandi:

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið samtykkir at senda uppskotið til landsstýrið.

Ein minniluti (Edmund Joensen) tekur ikki undir við uppskotinum.

# 145. Samráðingar við EF um treytir fyri limaskapi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Landsstýrinum verður álagt í gjøgnum ríkisstjórnina at taka upp samráðingar við EF (Europeiska Búskaparliga Felagsskapin) um treytir fyri møguligum føroyskum limaskapi.

**Viðmerkingar:**

Tey stóru norðurlondini: Svøriki, Noreg og Finland hava saman við flestu av teimum Efta-londunum, sum eftir eru, Schweiz og Eysturriki, søkt um limaskap í EF.

Danmark, sum vit eru partur av, gjørdist sum kunnugt limur í 1973. Flestu eru á einum máli um, at hesin limaskapurin er beinleiðis orsøkin til, at landið er búskaparliga best fyri av Norðurlondum. Hetta er eisini beinleiðis orsøkin til, at stjórnirnar í hinum norðurlondum nú vilja fylgja Danmark eftir og gerast limir.

Eitt samt Føroya Løgting avgjørdi í 1973, at Føroyar skuldu ikki fara upp í saman við Danmørk. Eingin ivi er um, at hetta var ein røtt avgerð tá.

Ræsumar at fiska vóru rúmar; hetta var áðrenn sjómørkini vórðu sett út á 200 sjónír. Marknaðarlondini hjá Føroyum vóru flestu uttan fyri EF: Norðurlond, onnur EFTA-lond, saltfiskalondini fyri sunnan, t.d. Spania og Portugal umframt at Danmark var verandi sum heimamarknaður at rokna - aldargomlu rættindini hildu fram Danmarkar og Føroyar ímillum.

Eftir øllum sólarmerkjum at døma verða tað bert Grønland, Ísland og Føroyar, sum fara at standa uttan fyri eitt sameint Europa. Hetta er sera hættiligt. Hesi trý londini eiga framvegis at hava eitt tætt samarbeiði, men vit eiga ikki at gloyma.

at vit hava stórliga brúk fyri okkara umheimi. Føroyski búskapurin er vorðin meira og meira tengdur at londunum í EF. Eru vit ikki á varðhaldi, er stórur vandi fyri, at vit avbyrgja okkum úti í Atlantshavi, meira enn vit nakrantíð ætlaðu.

Tað, sum vit í norðurlondum hava til felags, er okkara søga, mál og mentan. Hetta eiga vit av øllum alvi at verja, varðveita og menna m.a. í norðurlandaráðnum.

**Handilsavtalan við EF**

1. januar 1992 kom í gildi nýggj handilsavtala millum Føroyar og EF.

Undir vigerðini av løgtingsmáli nr. 13/1991 førdi Sambandflokkurin fram, at avtalan ikki stóð mát við tað, sum roknað varð við frammanundan.

Víst var á, at flokkurin gekk inn fyri eini avtalu, sum fór at menna tað føroyska samfelagið, og ikki øvugt.

Í minnilutauppskotinum førdi umboð Sambandsfloksins fram millum annað:

1) Vinnulívsmenn høvdu víst á, at hundraðtals arbeiðspláss fóru at hvørva.
2) Føroyar mistu Danmark sum heimamarknað.
3) Avtalan forðaði okkum í at keypa og virka rávøru úr triðjalondum og selja vøruna á EF-marknaðinum í kapping við aðrar.
4) Avtalan fevndi um kvotur og loft, sum komu at forða fyri teirri menning av okkara samfelag, sum ætlanin var við eini frihandilsavtalu.

Sambandsflokkurin segði tá, at henda avtalan á ongan hátt kundi metast sum eitt liðugt úrslit, men í besta føri sum eitt stutt stig á leiðini fram ímóti eini endaligari loysn. Flokkurin sett sum treyt fyri at atkvøða fyri, at løgtingið samtykti uppskot um at fyrireika eitt nærri samstarv við EF, enn handilsavtalan bar í sær.

Hetta uppskotið til samtyktar fall, og tí atkvøddi flokkurin ikki fyri handilsavtaluni.

Tíðin er komin at kanna treytimar

Tað er nógv, sum týðir uppá, at tað fer at vera sera ivasamt, um vit føroyingar í tíðini, sum kemur, verða førir fyri at halda ein rímiligan livifót við tí tilfeingi, sum vit hava til taks eftir tær avmarkingar, ið okkum hava verið fyri seinastu árini.

Hóast teir fyrimunir, vit hava havt á EF-marknaðinum, ein stuðul úr Danmark upp á eina slaka milliard um árið, og hóast vit hava gingið okkara fiskigrunnum so nær, at vit hava niðurfiskað stovnamar, so er okkara samfelag komið upp í rasshaft við eini nettouttanlandsskuld upp á 9 milliardir kr., sum vit ikki síggja okkum nakran útveg fyri at kunna greiða. Alt okkara vinnulív hevur so trongar umstøður, at tað ikki sær nakran møguleika fyri at kunna yvirliva.

Tann stóri EF-marknaðurin verður nú latin aftur fyri londum, sum ikki eru limir. Hetta hevur sum nevnt ført við sær, at flestu EFTA- londini hava viðurkent, at tey eru ov smá og veik til at standa uttanfyri og hava tí søkt um limaskap.

Sjálvt um vit standa uttan fyri EF, verða vit noydd at laga okkum eftir fleiri og fleiri av teirra reglum. Vit hava fingið GATT-toll og meirvirðisgjald. Vinnulívslógirnar, sum vit við seinastu bankakreppuni pliktaðu okkum til at seta í gildi fyri Føroyar, eru eisini í samsvari við galdandi EF-krøv o.s.fr.

Tað er ein sannroynd, at av øllum Norðurlondum er tað EF-landið Danmark, sum hevur mest positivu búskaparligu gongdina. Svøríki, Finnland og Noreg viðurkenna, at teir hava ongan møguleika at venda skeivu búskapargongdini uttan at gerast limir í felagsskapinum. Teir vóru eisini greiðir um, at tað hevði skund at fáa samráðingar í lag, áðrenn spurningurin um limaskap fyri tey mongu Eysturlondini fór at gerast aktuellur. Hetta er eisini nakað, sum vit eiga at hava fyri eyga, tí tað er ikki sjálvsagt, at vit kunnu koma uppí, tá ið tað lystir okkum.

Okkara størsta vandamál í løtuni er at endurreisa føroyska búskapin. Øll eru samd um, at tað verður ikki gjørt einans við tí tilfeingi, sum okkara egnu skip kunnu veiða. Roknað verður við, at eini 500.000 tons av fiski streyma inn í Europa úr triðjalondum. Hesin fiskur kemur ofta langvegis frá sum fryst vøra, ið skal viðgerast og góðskast, áðrenn hon fer víðari til brúkaran. Vóru vit limir í EF, kundu vit útvegað okkum rávøru í fríari kapping við onnur limalond, góðska hana, og síðani selt ta lidnu vøruna innan felagsskapin.

Um vit á henda hátt fingu gongd á útflutningin, høvdu vit eisini fingið bøtt um arbeisloysisspumingin. Hetta er okkara besti møguleiki at basa arbeiðsloysinum. Men núverandi liðugtvørutollur er ein forðing fyri hesum, og hetta er ein av vansunum við at standa uttan fyri EF. Tey, sum halda, at hetta kortini letur seg gera, taka stórliga feil. Ætlanin við tollinum er júst at forða fyri sølu.

Fiskiídnaðinum má standa í boði henda møguleika, so hann gerst meira støðugur og minni viðkvæmur enn nú, tá bert heimasjógvurin er at líta á. Tá verða arbeiðsplássini tryggari, og keyparin av tí lidnu vøruni fær betri trygd fyri at fáa hana til ásettu tíðina.

Okkara alivinna er í stórum trupulleikum. Vit eru í stórum vanda fyri ikki at sleppa av við laksin, tá ið marknaðurin ofta er undir trýsti, og gerst m.o. lond Noreg limur í EF, er marknaðurin mettaður støðugt, og verður sostatt stongdur fyri okkum.

Samráðingar við EF um treytirnar fyri møguligum limaskapi høvdu m.a. avdúkað, um Føroyar høvdu fingið atgongd til størri fiskiøki og hin vegin, hvussu treytirnar høvdu verið viðvíkjandi okkara egna øki. Hetta verður eyðsæð ein avgerandi táttur í okkara endaligu støðutakan til limaskap.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 145/1992: Samráðingar við EF um treytir fyri limaskapi.*

Málið er lagt fram av Sambandsflokkinum tann 16. mars 1993 og eftir 1. viðgerð 25. mars 1993 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Hergeir Nielsen, Sverre Midjord, Sommer Winther og Helena Dam á Neystabø) er av teirri fatan, at hóast handilssáttmálin við EF á mangan hátt er vánaligur, eigur hann at standa sína roynd.

Handilssáttmálin, sum ikki er ársgamal, kann endurskoðast eftir tveimum árum, og í sáttmálanum eru møguleikar fyri samráðingum um broytingar av m.ø. kvotum og loftum.

Hildið verður ikki, at rætta løtan er nú til at taka upp samráðingar um at kanna møguleikarnar fyri limaskapi minni enn eitt ár eftir, at løgtingið samtykti ein handilssáttmála, sum verandi ta tá frægastu loysnina fyri samfelag okkara í viðurskiftum tess við EF.

Eisini er ásett í samstarvsavtaluni hjá samgonguni, at "Føroya støða til EF verður óbroytt".

Ein minniluti (Birgir Danielsen og Olaf Olsen) er stórt sæð samdur við uppskotsstillararnum í tí, sum ført er fram sum grundgeving fyri uppskoti til samtyktar. Minnilutin heldur tó, at ymiskt assosieringsalternativ átti at verið gjølliga kannað við serligum atliti at fingið fult tollfrælsi fyri okkara útflutningsvørum til EF og hvørja ávirkan hetta møguliga kundi fingið á okkara fiskiveiðumøguleikar bæði uttanfyri og innanfyri EFøki.

Alternativið tollsamgonga (tollunión) eigur at verða gjølliga lýst.

Tí setir minnilutin fram soljóðandi:

## Uppskot

## til

## samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at skipa fyri kanningum av alternativum møguleikum fyri tilknýti ella samstarvi millum Føroyar og EF við serligum atliti til fullum tollfrælsi fyri øllum føroyskum fiskavørum til EF marknaðin.

Minnilutin (Edmund Joensen) mælir til at samtykkja uppskotið.

# 146. Viðgerð av grannskoðaðum roknskapum

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Føroya løgting samtykkir at áleggja løgtingsgrannskoðarunum at kanna, um svik er framt í roknskaparháttinum hjá Strandfaraskipum Landsins soleiðis, sum ein fyrrverandi formaður og núverandi nevndarlimur í grannskoðaranevnd løgtingsins førir fram í Dagblaðnum 13. juni 1990, 20. juli 1990 og 27. juli 1990.

**Viðmerkingar:**

Undir viðgerðini av grannskoðaðu roknskapunum, sum vóru til viðgerðar her í tinginum fyri nøkrum døgum síðani, kom fram, at ein fyrrverandi formaður fyri løgtingsgrannskoðararnar og núverandi limur, yvir eitt tíðarskeið hevur skuldsett ein ávísan almennan stovn fyri at svika í roknskaparháttinum.

Hesir pástandir síggjast ikki aftur vístir í viðmerkingunum frá løgtingsgrannskoðarunum, hóast teir leingi hava verið vitandi um ákærumar. Ákærumar hava staðið í Dagblaðnum og kunnu endurtakast orðarætt soleiðis:

*Úr Dagblaðnum 13. juni 1990:*
"Illgrunasamt, bíligir, ella: *"Svikar í SL roknskapi fyri reyðu lastbilarnar?"*

*Úr Dagblaðnum 20. juli 1990:*
"Hetta rakstrarhall dylur Strandferðslan við at svika í roknskaparháttinum soleiðis, at veruliga undirskotið helst liggur millum 10-15 mió. kr. árliga og ikki 1,5 mió. kr., sum roknskapurin vísir."

*Úr Dagblaðnum 27. juli 1990:*
"Tryst og treiskt hevur Dagblaðið rikið fram undir, at Strandferðslan svikar við roknskapi sínum yvir "reyðu" lastbilarnar."

Ábyrgdarblaðstjóri á Dagblaðnum var Óli Breckmann, sum eisini var formaður fyri løgtingsgrannskoðaramar, tá omanfyrinevndu brot vórðu skrivaði.

Ákærumar eru so mikið álvarsamar, serstakliga tí tær koma frá einum av nevndarlimunum í løgtingsgrannskoðaranevndini og eiga tí at kannast nágreiniliga.

Er hald í skuldsetingunum, so er lítil ivi um, at føroyski skattaborgarin eigur at fáa kunnleika um hesi viðurskifti, og ákæra reisast móti teimum, sum svikið hava framt. Hetta er orsøkin til uppskotið til samtyktar.

**Álit**

**í**

*Løgtingsmáli nr. 146/1992: Viðgerð av grannskoðaðum roknskapum.*

Málið er lagt fram av Sjálvstýrisflokkinum tann 16. mars 1993 og eftir 1. viðgerð 25. mars 1993 beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Mikkjal Sørensen, Hergeir Nielsen og Birgir Danielsen) vísir á, at løgtingsmálið nr. 4-2/92: Grannskoðan av almennum roknskapum – Strandfaraskip Landsins 1989-91 – er viðgjørt og samtykt av løgtinginum í hesi tingsetuni og vísir til álitið í nevnda máli.

Meirilutin tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Ein minniluti (Lisbeth L. Petersen) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Ein annar minniluti (Helena Dam á Neystabø) tekur støðu í tingsalinum.

# 147. Viðgerð av almannaverkinum

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

1. Føroya løgting áleggur landsstýrinum, at allir grannskoðaðir roknskapir fyri almannaverkið, sum ikki hava fingið tingviðgerð, koma til viðgerðar á Føroya Løgtingi saman við viðmerkingum.

2. Føroyar Løgting áleggur landsstýrinum at koma við frágreiðing um uppsøgnina hjá fyrrverandi stjóranum á almannastovuni umframt setanina av nýggjum almennum starvi.

**Viðmerkingar:**

Føroya løgting hevur enn onga frágreiðing fingið frá landsstýrinum um gongdina í almannamálum, hetta hóast drúgva umrøðu av almannamálum seinastu dagarnar, bæði í føroyskum og útlendskum fjølmiðlum.

Umrøðan tykist stava frá eini frágreiðing, sum landsgrannskoðarin hevur gjørt í sambandi við endurgjaldið frá danska statinum, og sum førdi til, at almannastjórin legið starvið frá sær.

Vit fáa varhugan av, at tilvildin hevur rátt í stóran mun, og at fleiri viðurskifti ikki hava verið umsitin á rættan hátt, og í samsvar við karmarnar í almannalóggávuni.

Tíðindini frá hesi viðgerð eru so skelkandi, at neyðugt er, at Føroya løgting fær eina neyva og nágreiniliga frágreiðing frá landsstýrinum, ikki bert í spurningum, sum snúgva seg um endurgjald, men eisini í øðrum spurningum, sum snúgva seg um dagligar avgreiðslur av almannamálum.

Spurningurin um uppsøgnina og setanina í annað alment starv av fyrrv. stjóranum á almannastovuni hevur eisini verið ørkymlandi. Partar av landsstýrinum hava boðað frá, at teir fingu ikki fundarboð, tá setanin fór fram, og at teir heldur ikki fingu kunnleika um eitt tilmæli frá Almanna- og Heilsudeildini um tænastumannasak móti fyrrv. stjóranum á almannastovuni, men hóast øll hesi ógreiðu viðurskifti, so hevur løgmaður kortini avgreitt og sett fyrrv. stjóran í nýtt alment starv, uttan at starvið er lýst leyst at søkja.

Øll henda viðgerð í sambandi við almannaviðurskiftini og setanina av stjóranum í annað alment starv, undrar flest allar føroyingar, og er hetta eisini orsøkin til uppskotini til samtyktar.

## Álit

### í

*løgtingsmáli nr. 147/1992: Viðgerð av almannaverkinum.*

Málið er lagt fram av Sjálvstýrisflokkinum tann 16. mars 1993 og eftir 1. viðgerð tann 31. mars 1993 beint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jørgen Niclasen, Jacob Lindenskov, Jørgen Thomsen og Lisbeth L. Petersen) vísir á, at viðvíkjandi punkt 1 í uppskotinum, so hevur meirilutin álit á løgtingsgrannskoðaranum. Viðvíkjandi punkt 2, so hevur løgmaður í tinginum givið frágreiðing hesum viðvíkjandi. Meirilutin tekur tí ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Trygvi Kallsoy) tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskot Sjálvstýrisfloksins.

# 148. Broytingar í konkurslógini at forða spekulatión í gjaldsteðgi og húsagangi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at gera broytingar í konkurslógini, sum forða fyri spekulatión í gjaldssteðgi og húsagangi soleiðis, at ikki verður loyvt teimum at eiga í skipi ella virki í eitt nærri ásett áramál, sum kosta landi ella persónum peningaligt tap.

**Viðmerkingar:**

Ein stórur partur av uttanlandsskuldini upp á 8 mia. kr. er nú endaður í landskassanum. Tað er m.a. hent gjøgnum veðhald fyri skip og virkir, ið eru farin á húsagang.

Ofta hava somu eigarar keypt skip og virkir aftur, annaðhvørt beinleiðis ella frá peningastovnum, ið fyrst hava keypt á tvingssilssølu og síðani flutt vinnutólið aftur á somu hendur. Eisini fíggingarstovnar hjá landinum, sum Menningargrunnurin og Ídnaðargrunnurin sigast hava nýtt hesa mannagongd, ið má haldast vera sera óheppin.

Onnur lond hava broytt konkurslógina soleiðis, at ikki skal bera til longur við spekulatión í gjaldssteðgi og húsagangi. Eigarar í virkjum, ið noyðast á húsagang, sleppa ikki at keypa virkini aftur ella at fara undir nýtt virksemi í eitt nærri ásett áramál, um tað hevur kostað landi ella persónum peningaligt tap.

Hetta opnar samtíðis fyri møguleikum hjá øðrum, ið hava hug og vilja til at fara undir nakað.

Sum er, forðar einki her á landi fyri, at fyritøka fer á húsagang bæði eina og tvær ferðir og endar aftur á sonu hondum, sjálvt um aðrir eru áhugaðir, ið kanska høvdu dugað betur og fingið meiri burturúr, til gagns fyri bæði virki, land og kommunu.

Tí er tað bæði eitt moralskt og eitt vinnuligt framstig, um konkurslógin verður broytt, so at menn noyðast at steðga nøkur ár, ið ikki fingu virki at ganga, áðrenn farið verður undir nakað nýtt.

# Álit

# í

*løgtingsmáli nr. 148/1992: Broytingar í konkurslógini at forða spekulatión í gjaldsstegði og húsagangi.*

Málið er lagt fram av Kristiliga fólkaflokkinum, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 16. mars 1993 og eftir 1. viðgerð tann 30. mars beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið. Spurningurin um likvidatión og sjálvbodnari likvidatión er viðgjørdur í løgtingsmáli nr. 28/1991, har samtykt varð, at álagt varð landsstýrinum at kanna, hvat gjørt verður í øðrum londum fyri at sleppa undan misbrúki í sambandi við likvidatiónir, serliga tá almennur peningur stendur fyri tapi, og um møguliga taka úrslitið av kanningunum við í tí nevndararbeiðinum, sum í løtuni verður gjørt viðvíkjandi partafelagslóg, bankalóg, roknskaparlóg v.m.

Í álitinum í tí málinum varð víst á, at tað fer ongantíð at verða lætt at taka støðu til, um ávísur persónur skal hava loyvi til at keypa eina ogn aftur. Nær ein persónur, sum t.d. hevur verið við í einum partafelag, sum má steðga sínum virksemi, kann fáa loyvi at verða við í øðrum partafelag, sum keypir ognirnar aftur. Ella nær tað ber til at forða einum partánara sjálvum at keypa sær eitt trotabúgv, sum hann sjálvur hevur verið partánari í. Avgerðir av hesum slagi vilja altíð verða sera subjektivar.

Nevndin er av teirri áskoðan, at við samtyktunum í løgtinginum av løgtingsmálunum nr. 154-158/1992 um vinnulívslóggávu av ymsum slag eru settar í gildi í Føroyum munagóðar reglur, ið kunna byrgja fyri at slíkt misbrúk, sum umrøtt í fyriliggjandi máli fer fram.

Meirilutin (Mikkjal Sørensen, Hergeir Nielsen og Birgir Danielsen) tekur ikki undir við málinum.

Minnilutin (Lisbeth L. Petersen) tekur undir við málinum, meðan minnilutin (Helena Dam á Neystabø) tekur støðu í tingsalinum

# 149. Fýra trolfrí øki á landleiðini

**I Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrinum at koma við uppskoti um at avmarka veiðitrýstið, so tað stendur til tilfeingið. Sum ein liður í hesum arbeiði eigur landsstýrið at skipa so fyri, at tað verða t.d. fýra trolfrí øki á landleiðini. Skotið verður upp at brúka verandi friðingar sum útgangsstøði, har økini verða løgd soleiðis:

Eitt norðanfyri, eitt eystanfyri, eitt sunnanfyri og eitt vestanfyri.

**II Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrinum, at gýtingarleiðirnar, sum eru friðaðar til 31. mars, ikki verða opnaðar fyri troling, her er talan um øki I, II, III norðanfyri og øki IV vestanfyri. Hetta skal verða galdandi, til landsstýrið er komið við uppskoti um at avmarka veiðitrýstið, so tað stendur til tilfeingið.

**Viðmerkingar:**

Tað hava verið fleiri fundir um "Framtíðar fiskivinnu í Føroyum". Undirritaði var við á einum tílíkum fundi á fiskirannsóknarstovuni 12. og 13. oktober 1992. Hesin fundur varð framskundaður av teirri orsøk, at niðurstøðan skuldi vera tøk, tá ið IMF-umboðini komu til Føroya fyrstu ferð. Teir hava nú verið her tvær ferðir, og einki røkist fyri, at nakað ítøkiligt kemur frá landsstýrinum, um at avmarka veiðitrýstið, so tað stendur til tilfeingið.

Úrslitið av umtalaðu fundarrøð kunnu tingmenn lesa um í einum bóklingi, sum er útbýttur í tinginum: "Framtíðar fiskivinna í Føroyum".

Av tí at fiskastovnurin undir Føroyum er so illa fyri, sum ongantíð ið menn vita um, er bráðneyðugt at friða ein part av Føroyagrunninum alt árið fyri trol soleiðis, at vit fáa náttúrlig botnviðurskifti á teimum leiðum, sum verða fríar fyri trol í framtíðini.

Tað hevur verið nógv tosað og skrivað um, hvussu vit uppbyggja fiskastovnarnar aftur undir Føroyum. Tað, sum orðaskiftið hevur snúð seg um, er andsøgnin millum trol og húk. Trupulleikin er tann, at snella og lína ikki kunnu fiska saman við trolinum, úrslitið verður altíð tað, at húkaveiðan verður við sviðið soð.

Alt síðani fiskimarkið varð útflutt á 200 fjórðingar, trolaraflotin tók at vaksa í stórum tali, føroyingar veiddu størri part av samlaðu nøgdini á Føroyaleiðini, er veiðitrýstið økt munandi av tí,at skip løgdu um frá línu til partrol, og studningurin var stórur serliga á upsa.

Tað var greitt longu í 1980, at veiðitrýstið á Føroyaleiðini var 1/3 ov stórt. Hóast hesa niðurstøðu longu tá, varð farið at umbyggja línu-, skittfiska- og partvís kraftblokkabátar til partroling.

Hetta var gjørt við stórari vælvild frá landsstýrinum fyrst í 80-árunum.

Fyri at skifta motor og annað, sum skuldi gera hesi skip før fyri at partrola, varð gingið eftir lógini, sum tilskrivaði 70% í veðhaldi og 20% í stuðulsláni, tey fyrstu 10% skuldu eitast at vera eginpeningur. Hetta ævintýrið var ikki at enda komið í 1984-85.

Tað hevur verið hildið uppá, at trolararnir fiska ongan tosk. Vísandi til hjálagdu talvur fyri trý tey seinastu árini sæst, at tá ið talan er um tosk, so veiddi húkurin í 1991 59%, meðan trolararnir veiddu 41% av tí toski, sum varð veiddur á føroyskum øki.

Taka vit árið 1992, veiddi húkurin bert 48%, meðan trolararnir veiddu 52% av tí toski, sum dripin var á føroyskum øki.

Taka vit so heildarveiðuna fyri 1991 (sí talvu), so veiddi húkurin 27% og trolið 73% í mun til 1992, har húkurin bert veiddi 18%, meðan trolið veiddi heili 82% av tí, sum veitt var á føroyskum øki.

Hetta vísir, at húkurin hevur mist heili 11% av toskaveiðuni og 9% av teirri samlaðu veiðuni eftir bert einum ári.

Um hesum veiðihátti skal verða lív lagað í framtíðini, er neyðugt at gera nakað munagott.

Vísandi til løgtingslóg nr. 8. frá 29. mars 1978 við seinni broytingum loyvir flokkurin sær at seta hesi uppskot til samtyktar.

Hjálagda kort er bert eitt uppskot at arbeiða út frá, hvussu hesi øki kundu verið løgd.

Fyri at tað skal vera møguleiki at fáa uppskotið samtykt, havi eg loyvt mær at brúka verandi friðingar sum útgangsstøði, sum eisini eru gýtingarleiðir. Norðanfyri og vestanfyri er serliga talan um toska- og hýsuleiðir.

# Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 149/1992: Fýra trolfrí øki á landleiðini.*

Málið er lagt fram av Tjóðveldisflokkinum tann 24. mars 1993 og eftir 1. viðgerð tann 14. apríl 1993 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirihluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Heimi O. Heinesen, Sommer Winther, Jógvan Ingvard Olsen, Asbjørn Joensen og Leivur í Buð) førir fram: Havið er ikki ein ótømandi brunnur. Fiskastovnarnir á landleið okkara eru - eins og fiskastovnarnir á øllum heimsins fiskileiðum - avmarkaðir í støddd. Fara royndirnar upp um eitt ávíst mark, verða stovnarnir ovveiddir. sum svíður at veiðimongd og harvið úrtøkuni í framtíðini.

Veruleikin er tann, at toska-, hýsu- og upsastovnarnir, ið hvussu so er, eru ovveiddir, við tí úrsliti, at veiðimongd og úrtøka minkar og verða minni og minni fyri hvørt ár, ið gongur.

Fyrsta takið verður tí at fáa hesar stovnar upp aftur. Hetta má gerast nú beinanvegin. Fyriliggjandi uppskot ber á tað borðið, at fiskastovnarnir kunnu koma fyri seg aftur. Haraftarat hevur uppskotið við sær, at botngróðurin fær vaksið aftur á teimum leiðum, sum verða friðaðar fyri trol.

Fiskirannsóknarstovan hevur gjørt meting um, hvat teir ymisku fiskastovnarnir, aftur fyri seg komnir, við miðaltilgongd og við góðari stovnsrøkt, kunnu veita okkum árliga. Mett verður, at av botnfiski kunnu fiskast umleið 120 til 130.000 tons. Av sild, makreli, svartkjafti, gullaksi o.ø. umleið 300.000 tons. Haraftrat kemur so tann laksur, sum kann fiskast í føroyskum sjógvi.

Meginreglan í fiskivinnupolitikkinum má tí verða tann, at vit røkja og nýta fiskiríkidømi landgrunnsins soleiðis:

1) At hetta ríkidømi verður varðveitt og umsitið sum verandi grundarlag undir føroyska búskapinum.
2) At royndirnar verða ikki størri enn fiskastovnarnir tola.
3) At teir fiskastovnar, ið eru ovveiddir, verða uppbygdir aftur.
4) At støddd og samanseting veiðiflotans verður lagað eftir hesum møguleikum.

Annars vísir meirilutin á skriv frá Fiskirannsóknarstovuni, dagfest 18. september 1992 um framtíðar fiskivinnuna í Føroyum, har m.a. stendur "Størsta búskaparliga hóttanin í løtuni er, at rávørugrundarlagið svíkur. Fiskiskapurin í ár er so vánaligur sum ongantíð í nýggjari tíð."

Út frá hesum mælir meirilutin løgtinginum til at samtykkja fyriliggjandi uppskot.

Minnilutin ( Jógvan A. Johannesen) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (John Petersen) er partvís samdur við uppskotsstillaran um, at ávís økir eiga at vera avløgd fyri húkaveiðu, so hesin reiðskapur, trol/húkur, kunnu búleikast hvør sær á grunninum.

Men at tað bert er ovfisking av toska-, hýsu-, og upsastovnunum, ið ger, at hesin er burturblivin, er minnilutin ikki samdur í, her eru nógvar umstøður, ið gera seg galdandi, hví fáa vit rækjur vesturi á rygginum í dag í størri mun?

Undanfarna landsstýrið heitti við brævi á partarnar um at seta seg saman og blíva samdir um hesar leiðir, tí heldur minnilutin, at man eigur fyrst at lata partarnar finna saman, um ikki, verður man noyddur politiskt at gera hetta, um teir politisku partarnir kunnu finna saman, hetta hevur víst seg at vera sera trupult.

# 150. Gransking í viðgerðarhættum og marknaðarføring av svartkjafti, sild, makreli o. ø.

Ein trupulleiki í føroyska samfelagnum í dag er, at tey vanligu botnfiskasløgini eru sera illa fyri, serliga toskur og hýsa. Harafturímóti hava vit fiskasløg, sum vit ikki gera fulla nyttu burturúr, so sum svartkjaft, sild, makrel o.a. Vit kenna til, hvussu hesi fiskasløg kunnu veiðast, men ikki nóg mikið til viðgerðarhættir og marknaðarføring av hesum vørum.

Endamálið við hesum uppskoti er at skapa útvegir fyri at fáa meira burtur úr omanfyri nevndu fiskasløgum, sum í størri og smærri nøgdum eru at fáa rundan um Føroyar og í altjóða sjógvi. Á henda hátt kunnu vit skapa størri útflutningsvirði og fleiri arbeiðspláss her á landi.

Neyðugt er tí at gera málrættaðar kanningar av viðgerðarhættum og marknaðarføring av hesum fiskasløgum og úrdráttum. Ein slík kanning tekur tíð og kostar, tí er neyðugt at seta pening av til hetta á eini 2 - 3 fíggjarlógum. Skotið verður upp, at ein upphædd upp á 10 mill. kr. hvørt ár hesi 2 - 3 árini verður játtað til endamálið. Fyri inniverandi fíggjarár verður upphæddin tikin av játtanum til íløgur.

Við hesum viðmerkingum verður lagt fram soljóðandi:

# Uppskot

# til

# samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at gera eina ætlan og at seta pening av á fíggjarlógini yvir eini 2 - 3 ár til gransking av viðgerðarhættum og marknaðarmøguleikum av tí tilfeingi, vit í dag ikki gera fulla nyttu burturúr so sum svartkjafti, síld, makreli og øðrum. Upphæddin, sum skal nýtast í ár, verður tikin av íløgujáttanini á fíggjarlógini fyri 1993.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 150/1992: Gransking í viðgerðarhættum og marknaðarføring av svartkjafti, síld, makreli o.ø.*

Málið er lagt fram av Sambandsflokkinum tann 16. mars 1993 og eftir 1. viðgerð 31. mars beint í ídnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og er samd um, at vit í dag ikki fáa fulla nyttu burtur úr teimum fiskasløgum, sum nevnd eru í uppskotinum, og at tað er neyðugt at fáa gjørt nakað munagott, so mest møguligt fæst burtur úr tí tilfeingi, vit hava. Ein samd nevnd tekur undir við málinum, tó við tí fyrivarni, at landsstýrið tillagar tann fíggjarliga táttin, og mælir tinginum til at samtykkja uppskotið.

# 151. Uppskot til samtyktar viðvíkjandi marknaðarviðurskiftunum

**Viðmerkingar:**

Í meira enn 17 ár hava føroyingar og danir samráðst og stríðst um rættin til ta føroysku undirgrundina. Í 1976 var sjómarkið flutt út á 200 fjórðingar, og miðlinjan varð nýtt sum mark í teimum førum, tá ið 200 fjórðingar mark ikki var møguligt. Miðlinjan varð viðurkend av øllum pørtum bæði dønum, bretum og norðmonnum, og yvirhøvur um allan heim var miðlinjan viðurkend sum tann einasta rímiliga og logiska loysnin. Men rættindini til undirgrundina komu ikki upp á pláss samstundis.

Tá ið føroyingar í desember mánaði í fjør yvirtóku ráevnini í undirgrundini, varðveittu danir yvirvaldsrættin. Alla hesa tíð hava danir hildið ógvuliga fast um yvirvaldsrættin (overhøjhedsretten), og hava teir tí havt ábyrgd og skyldu at umboða áhugamál føroyinga í marknamálum. Men tað altavgerandi vandamálið, nevniliga marknatrætan við Bretland, var og er framvegis óloyst.

Uppgávan hevur ligið á láni. Í Føroyum eru vit púra ófyrireikað, nú ið bretar hava funnið bestu olju nakrar fáar fjórðingar úr føroyska sjómarkinum, og teir eru farnir undir at troyta hetta ríkidømið beinanvegin, hóast marknatrætan ikki er loyst.

Støða Føroya viknar fyri hvønn dag, sum gongur. Eingi stig eru tikin, ið vísa, at eisini føroyingar vilja gagnnýta ráevnini í egnu undirgrund sínari. Tíðin virkar til fyrimuns fyri Bretland.

Nú tykist tað, sum danir blaka yvirvaldsrættin frá sær, hóast sínar skyldur at umboða áhugamál okkara lands. Grundgevingar breta eru ein hóttan í móti Føroyum og føroyskum øki. Teir viðurkenna ikki miðlinjuna í marknatrætuni Føroya og Bretlands ímillum, hóast teir hava viðurkent miðlinjuna í øðrum førum, tá ið tað var ein fyrimunur fyri Bretland. Rímiligheitsprinsipp breta er sostatt einans eitt til eina og hvørja tíð størsti - fyrimunur - fyri - meg prinsipp.

Tað er umráðandi, at stig verða tikin beinanvegin, ið føra við sær, at báðir partar viðurkenna miðlinjuna, og at málið verður tikið niðan í løgtingið, meðan nøkur undirgrund enn er at viðgera, áðrenn vit hava spælt okkum hana av hendi. Landsstýrismenn trætast um, hvør ið skal umsita orkumál uttan yvirhøvur at vita, um tað er nøkur undirgrund at bora í. Neyðugt verður at lyfta málið upp á eitt politiskt stig sum skjótast og at taka upp beinleiðis samráðingar við Bretland.

Sjálvstýrisflokkurin setir tí fram soljóðandi:

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Heitt verður á Føroya landsstýri beinanvegin at taka stig til og leggja alla orku sína í, at marknatrætan Føroya og Bretlands ímillum sum skjótast verður loyst sambært miðlinjuni.

# 152. Løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg um vinningssteðg

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg um vinningssteðg.*

*lagtingslov om ophævelse af lagtingslov om avancestop.*

**§ 1.**

Løgtingslóg nr. 41 frá 27. mars 1990 verður sett úr gildi.

**§ 1.**

Lagtingslov nr. 41 af 27. marts 1990 ophæves.

**§ 2.**

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft dagen efter kundgørelsen.

**Viðmerkingar:**

Lógin um vinningssteðg hevur verið í gildi síðani byrjanina av 1990 og hevur sostatt virkað í nærum 3 ár. Vanligt er, at ásetingar um vinningssteðg bert virka í heilt avmarkað tíðarskeið, og ongantíð meir enn 1/2 ár. Skotið verður tí upp, at lógin verður avtikin.

Prísráðið mælir somuleiðis til, at lógin verður avtikin, og hevur frá 1. januar ásett hámarksprís á ávísar vørubólkar (matvørur, klæðir o.a.). Hetta fyri í eini skiftistíð at stabilisera marknaðin, nú mvg-skipanin er komin at virka, men eisini við atliti at lógaruppskotinum um at avtaka lógina um vinningssteðg, sum nú verður lagt fyri Løgtingið.

**Álit**

**í**

*løgtingsmáli nr. 152/1992: Løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg um vinningssteðg.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 16. mars 1993 og eftir 1. viðgerð 18. mars 1993 beint í fiðnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

# 153. Ígildissetan í Føroyum av lógarkunngerð "om banker og sparekasser"

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið mælir ríkismyndugleikunum til, at lógarkunngerð nr. 57 frá 2. februar 1993 "om banker og sparekasser m.v." verður sett í gildi í Føroyum við hesum broytingum:

1. *§ 1 a, stk. 3 verður broytt til:*

   "Pengeinstitutter må gennem datterselskaber drive forsikringsvirksomhed, såfremt denne ikke strider mod færøsk lovgivning, og realkreditvirksomhed."

2. *§ 6, stk. 9 verður broytt til:*

   "Finanstilsynet kan i overensstemmelse med bestemmelserne i Rådets 2. samordningsdirektiv suspendere behandlingen af ansøgninger om godkendelse af pengeinstitutter, som direkte eller indirekte ejes af selskaber med hjemsted i et land inden for De Europæiske Fællesskaber, som ikke har indgået en aftale med Færøerne i medfør af § 6a, eller med hjemsted uden for De Europæiske Fællesskaber."

**3.** *§ 6a, stk. 1 verður broytt til:*

"Et udenlandsk kreditinstitut, der er meddelt tilladelse i et andet land inden for De Europæiske Fællesskaber, kan begynde at udøve virksomhed på Færøerne gennem en filial 2 måneder efter, at Finanstilsynet har modtaget meddelelse herom fra tilsynsmyndighederne i hjemlandet, jfr. stk. 2, såfremt der mellem Færøerne og hjemlandet er indgået aftale om, at færøske pengeinstitutter har tilsvarende rettigheder i vedkommende land. Filialen kan udøve de i bilag 1 nævnte aktiviteter, såfremt disse er omfattet af kreditinstituttets tilladelse i hjemlandet".

**4.** *§ 6a, stk. 5 verður broytt til:*

"Et udenlandsk kreditinstitut, der er meddelt tilladelse i et andet land inden for De Europæiske Fællesskaber, kan begynde at udøve virksomhed på Færøerne som grænseoverskridende tjenesteydelser, når Finanstilsynet har modtaget meddelelse herom fra tilsynsmyndighederne i hjemlandet, såfremt der mellem Færøerne og hjemlandet er indgået aftale om, at færøske pengeinstitutter har tilsvarende rettigheder i vedkommende land. Kreditinstituttet kan udøve de i bilag 1 nævnte aktiviteter, når hjemlandets tilsynsmyndigheder har erklæret, at disse er omfattet af kreditinstituttets tilladelse i hjemlandet".

**5.** *§ 6 b, stk. 1 verður broytt til:*

"Et pengeinstitut hjemmehørende på Færøerne, der ønsker at etablere en filial i et andet land inden for De Europæiske Fællesskaber, som har indgået en aftale med Færøerne i medfør af § 6 a, stk. 1, skal meddele dette til Finanstilsynet sammen med følgende oplysninger om filialen:

1) i hvilket land filialen ønskes etableret,
2) en beskrivelse af filialens virksomhed, herunder oplysninger om organisationen og de planlagte aktiviteter,
3) filialens adresse og
4) navnene på filialens ledelse."

**6.** *§ 6 b, stk. 5 verður broytt til:*

"Et pengeinstitut, der ønsker at udøve virksomhed i form af grænseoverskridende tjenesteydelser i et andet land inden for De Europæiske Fællesskaber, som har indgået en aftale med Færøerne i medfør af § 6a, stk. 1, skal give Finanstilsynet meddelelse herom med angivelse af, i hvilket land virksomhed ønskes påbegyndt, og hvilke aktiviteter der ønskes udøvet."

**7.** *§ 7 b, stk. 5 verður broytt til:*

"Finanstilsynet kan i overensstemmelse med bestemmelserne i Rådets 2. samordningsdirektiv suspendere behandlingen af en ansøgning om et selskabs direkte eller indirekte erhvervelse af de i stk. 1 fastsatte andele i et pengeinstitut, hvis selskabet ligger i et land inden for De Europæiske Fællesskaber, der ikke har indgået en aftale med Færøerne efter § 6a, stk. 1 eller med hjemsted uden for De Europæiske Fællesskaber."

**8.** *§ 9, stk. 1 verður broytt til:*

"Bestyrelsen skal bestå af mindst 5 medlemmer, hvoraf 1 medlem udnævnes af Færøernes Landsstyre."

**9.** *§ 42 verður broytt til:*

"Når det sandsynliggøres, at en bank-, sparekasse- eller andelskassebog eller et af et pengeinstitut udstedt indlånsbevis eller modtagelsesbevis er bortkommet, er pengeinstituttet berettiget til ved bekendtgørelse, der indrykkes i Statstidende i det første nummer i et kvartal, med 3 måneders varsel at indkalde ihændehaveren eller på samme måde i et eller flere dagblade, der udkommer på pengeinstituttets hjemsted. Hvis ingen melder sig, kan pengeinstituttet udbetale, hvad der skyldes efter bank-, sparekasse- eller andelskassebogen eller beviset, til den, der efter pengeinstituttets bøger er fordringshaver."

**10.** *§ 44 b verður broytt til:*

"Finanstilsynet kan efter de procedurer, der er fastsat i EF- direktiver om kreditinstitutter, forbyde et udenlandsk kreditinstitut med hjemsted i et andet land inden for De Europæiske Fællesskaber, som har indgået en aftale med Færøerne i medfør af § 6a, stk. 1., at udøve virksomhed på Færøerne gennem en filial eller i form af grænseoverskridende tjenesteydelser, hvis instituttet groft eller gentagne gange har overtrådt bestemmelser i denne lov, regler udfærdiget i medfør af loven eller anden lovgivning, der retter sig mod finansiel virksomhed, og det ikke ved påbud eller sanktioner efter denne lov har været muligt at bringe overtrædelserne til ophør."

**11.** *§ 50, stk. 2 verður broytt til:*

"Tilsynsmyndighederne i et andet land inden for De Europæiske Fællesskaber, som har indgået en aftale med Færøerne i medfør af § 6a, stk. 1, kan efter forudgående meddelelse herom til Finanstilsynet foretage inspektion i de her i landet beliggende filialer af udenlandske kreditinstitutter med hjemsted i det pågældende land."

**12.** *§ 52 g verður broytt til:*

"Et aktieselskab, som i medfør af reglerne i dette kapitel overtager en sparekasse, er berettiget til at at betegne sig som sparekasse, idet dog ordene "aktieselskab" eller "partafelag" eller deraf dannede forkortelser skal tilføjes navnet."

**13.** *§ 55, stk. 1 ændres således:*

"Loven træder i kraft den 1. januar 1994."

**14.** *Í § 56 verða sum nýggj stk. 10 - 12 sett:*

**Stk. 10.** "Inden 1 år efter denne lovs ikrafttræden skal enhver bank eller sparekasse, som ikke er under likvidation, have foretaget de vedtægtsændringer, der nødvendiggøres af loven. Vedtægtsændringer, der af tilsynet med banker og sparekasser godkendes som nødvendige for at bringe vedtægterne i overensstemmelse med loven, kan i banker og i sparekasser med garanter foretages af bestyrelsen, henholdsvis tilsynsrådet, uden indkaldelse af generalforsamlingen."

**Stk. 11.** "Valg til repræsentantskab i sparekasser skal finde sted senest 2 år efter lovens ikrafttræden. Det nyvalgte repræsentantskab vælger herefter på sit første møde bestyrelsen."

**Stk. 12.** "Indtil valg efter stk. 11 har fundet sted, udøves repræsentantskabets funktioner af den myndighed, som hidtil har udøvet generalforsamlingens funktioner."

**Viðmerkingar:**

Landsstýrið setti á fundi tann 4. apríl 1991 ein arbeiðsbólk at endurskoða ymiskar vinnulógir, herundir eisini lóggávuna um bankur og sparikassar.

Arbeiðsbólkurin lat landsstýrinum álit tann 25. februar 1993, og niðurstøðan hjá arbeiðsbólkinum var hendan:

"Í semjunum við donsku stjórnina um lán til føroyska landskassan er m.a. tilskilað, at danska lógin um bankar- og sparikassar skal setast í gildi í Føroyum við kongaligari fyriskipan, og avmarkar hetta sjálvandi møguleikarnar fyri stórvegis broytingum í lógini.

Arbeiðsbólkurin er samdur um, at so fáar broytingar í donsku banka- og sparikassalógini eiga at verða gjørdar sum møguligt. Hetta fyrst og fremst fyri at styrkja um altjóða samskifti við føroyska peningamarknaðin.

Bert tá heilt átroðkandi føroysk serviðurskifti gera seg galdandi, heldur arbeiðsbólkurin, at tað er rætt at broyta lógina. Tey viðurskifti, sum í hesum sambandi kunnu koma upp á tal eru:

1) at etableringsrætturin hjá EF-peningastovnum í Føroyum verður treytaður av, at føroyskir peningastovnar hava samsvarandi sømdir í heimlandinum hjá avvarðandi peningastovnum, og
2) at teir partar í lógini, sum umrøða rættin hjá peningastovnunum at reka tryggingarvirksemi gjøgnum dóttirfeløg fær uppískoytið: "såfremt denne ikke strider mod færøsk lovgivning".

Arbeiðsbólkurin mælir at enda til, at tær neyðugu skiftisskipanirnar, millum annað viðvíkjandi roknskaparrapportering, ikki verða beinleiðis ásettar í lógini, men heldur sum undantaksloyvi frá Fíggjareftirlitinum í hvørjum einstøkum føri, so leingi sum hetta er neyðugt.

Neyðugt er tó at áseta skiftisreglur í sjálvari lógini, sum geva sparikassunum tíð at broyta bygnaðin samsvarandi krøvunum í lógini, og verður skotið upp, at hetta tíðarskeiðið verður sett til tvey ár."

Landsstýrið tekur undir við tilmælinum hjá arbeiðbólkinum og leggur við hesum fram uppskot til broytingar í lógarkunngerðini um bankar og sparikassar v.m. samsvarandi hesum. Landsstýrið vísir annars til sjálvt og viðleggur álitið hjá arbeiðsbólkinum, harav grundgevingarnar fyri broytingunum í dousku lógina framganga.

Arbeiðbólkurin vísir annars á, at tilvísingarnar í donsku lógini til ársroknskaparlógina skulu justerast, um so er, at ein serføroysk lóg verður gjørd á hesum øki. Landsstýrið ætlar at seta donsku ársroknskaparlógina í gildi við kongaligari fyriskipan, og tí verður ikki neyðugt við broytingum í donsku lógini á hesum øki. Danska banka- og sparikassalógin er rættiliga nógv tengd saman við partafelagslógini, og lógin vísir í fleiri greinum til "Erhvervs- og Selskabsstyrelsen". Landsstýrið arbeiðir í løtuni við spurninginum um at lata ein føroyskan stovn taka sær av teimum uppgávum, sum danska "Erhvervs- og Selskabsstyrelsen" sambært lógini um bankar og sparikassar skal røkja.

Verður talan um ein føroyskan stovn, verður neyðugt at justera donsku banka- og sparikassalógina, og víst verður til viðmerkingarnar í álitinum hjá arbeiðsbólkinum hesum viðvíkjandi.

Skotið verður upp, at danska banka- og sparikassalógin verður sett í gildi í Føroyum frá 1. januar 1994.

**Felagsálit**

**í**

*løgtingsmáli nr. 153/1992: Ígildissetan í Føroyum av lógarkunngerð "om banker og sparekasser".*
*mál nr. 154/1992: Ígildissetan í Føroyum av lógarkunngerð um "erhvervsdrivende fonde".*
*mál nr. 155/1992: Ígildissetan í Føroyum av lógarkunngerð "om visse kreditinstitutter".*
*mál nr. 156/1992: Ígildissetan í Føroyum av lógarkunngerð "om aktieselskaber".*
*mál nr. 157/1992: Ígildissetan í Føroyum av lógarkunngerð "om anpartsselskaber."*
*mál nr. 158/1992: Ígildissetan í Føroyum av lógarkunngerð "om visse selskabers aflæggelse af årsregnskab m.v."*

Málini eru løgd fram av landsstýrinum tann 18. mars 1993, tó varð nr. 158 lagt fram 23. mars, og eftir 1. viðgerð 22. mars – nr. 158 29. mars – vórðu øll beind í rættarnevndina..

Rættarnevndin hevur viðgjørt uppskotini frá landsstýrinum um at seta í gildi fylgjandi ríkislógir í Føroyum:

1) Lov om banker og sparekasser,
2) lov om erhvervsdrivende fonde,
3) lov om visse kreditinstitutter,
4) lov om aktieselskaber,
5) lov anpartsselskaber, og
6) lov om visse selskabers aflæggelse af årsregnskab m.v.

Hetta er størsti parturin av teimum lógum, sum nevndar eru í avtaluni millum landsstýrið og ríkismyndugleikarnar, sum gjørd varð 1. februar 1993, og sum sambært avtaluni við kongaligari fyriskipan skulu kunna setast í gildi í Føroyum seinast tann 18. apríl.

Nevndin hevur undir viðgerðini havt samrøður við umboð fyri vinnulívið, almennan stovn, sum arbeiðir við vinnulívsspurningum, og formenn í arbeiðsbólkum, sum landsstýrið hevur sett at gera uppskot til, hvussu vinnulívslóggávan kann verða endurskoðað. Tosað hevur verið við:

Eyðun á Rógvi Olsen fyri Føroya Sparikassa,
Brynjálv Jacobsen fyri Norðoya Sparikassa,

Gunnar í Liða fyri Føroya Banka,
Helga Brekku og Johan Djurhuus fyri Sjóvinnubankan,
Helga Fossádal fyri Fossbankan,
Jógvan Páll Lassen, adv., form. í arbeiðsbólki at endurskoða felagslóggávuna,
Jógvan Joensen, grannsk., formann í arbeiðsbólki at endurskoða ársroknskaparlóggávuna, og
Kjartan Kristiansen, stjóra á menningarstovuni.

Lógirnar áseta, at tær kunnu setast í gildi í Føroyum "med de afvigelser, som de særlige færøske forhold tilsiger" ella samsvarandi orðingar, og er tað sostatt avmarkað, hvørjar broytingar avvarðandi ráðharri hevur heimild til at gera í lógunum við ígildissetanina í Føroyum. Rættarnevndin hevur tí eisini kunnað seg um tað samskifti, sum hevur verð milluin landsstýrið og ríkismyndugleikarnar um, hvussu langt hendan heimildin røkkur.

Rættarnevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minniluta.

Meirilutin (Mikkjal Sørensen, Birgir Danielsen og Bjarni Djurholm) hevur hesar viðmerkingar til einstøku lógirnar:

**Til banka- og sparikassalógina:**

Lógin gevur sum heild bæði bankum og sparikassum fríari ræsur at virka undir enn verandi lóggáva. Bankarnir eru eftir lógini ikki álagdir at halda seg strangt til bankavirksemi, men kunnu eisini fara undir virksemi, sum er avleitt av bankavirkseminum, t.d. sølu av roknskaparskipanum, fíggjarstýring, ráðgeving v.m. Somuleiðis kunnu teir gjøgnum dótturfeløg reka tryggingar- og realkreditvirksemi. Sparikassarnir, sum eftir galdandi lóg bert kunnu veita útlán móti trygd í fastari ogn ella samsvarandi trygd, fáa eftir lógini somu sømdir sum bankarnir at virka undir.

Meirilutin heldur, at tað kann vera ein vandi fyri serliga í fyrstani, at peningastovnar undir hesum rúmaru ræsunum fara undir ætlanir, har vandin fyri at missa pening ikki stendur mát við vinningin, ella undir virksemi, har neyðugi kunnleikin ikki enn er til staðar. Meirilutin heldur tó, at føroysku peningastovnarnir skuldu verið varugir við tær royndir, sum peningastovnar hava gjørt aðrastaðni, og sostatt samsvarandi meiri varnir.

Solvensprosentið skal sambært lógini verða 10% frá 1. januar 1991, 9% frá 1. januar 1993 og 8% frá 1. januar 1995, og skal tað roknast av aktivunum í staðin fyri sum nú av passivunum. Samstundis verða aktivini vektað solciðis, at trygg útlán í sethúsum ella líknandi ikki byrjar solventsprosentið eins nógv sum meira ótrygg útlán.

Føroysku peningastovnarnir mæla til, at henda reglan verður sett í gildi, eftirsum hesin háttur at gera solventsprosentið upp, fer at lætta um útlánsmøguleikarnar. Meirilutin tekur undir við hesum tilmæli.

Landsstýrið skjýtur upp, at lógin verður broytt soleiðis, at møguleikin hjá peningastovnunum at reka tryggingarvirksemi gjøgnum dótturfeløg er treytaður av, at hetta er loyvt sambært lóggávuni annars. Eisini verður skotið upp, at tann í lógini ásetti rætturin hjá peningastovnum í EF at stovnseta deildir í Føroyum skal verða treytaður av samsvarandi møguleika hjá føroyskum peningastovnum at stovnseta deildir í EF. Meirilutin kann eisini taka undir við hesum partinum av uppskotinum.

Eftir uppskotinum hjá landsstýrinum skal lógin koma í gildi 1. januar 1994. Sparikassarnir taka undir við hesum uppskoti, meðan bankarnir mæla til, at lógin kemur í gildi skjótast gjørligt, t.d. 1. juli 1993. Meirilutin mælir til at halda fast við uppskotið hjá landsstýrinum, eftir sum banka- og sparikassalógin vísir til fleiri av teimum undir 2) - 6) nevndu lógum, sum eftir uppskoti landsstýrisins ikki skulu koma í gildi fyrr enn 1. januar 1994.

Landsstýrið skjýtur at enda upp, at tað verður givið sparikassunum ein skiftistíð upp á eitt ár at broyta viðtøkurnar í samsvar við lógarinnar krav. Ábyrgdarsparikassar, sum ikki klára at skipa fyri, at talið av atkvøðum, sum kunnu verða givnar av ábyrgdarum, er í minsta lagi 1000 (hvør ábyrgdari kann í mesta lagi fáa 20 atkvøður), skulu eftir lógini umskipa seg soleiðis, at innskjótarar eisini fáa høvi at greiða atkvøðu til umboðsráðið. Meirilutin kann eisini taka undir við hesum uppskoti.

Meirilutin hevur uppskot til málsligar rættingar í uppskotinum hjá landsstýrinum.

Samsvarandi omanfyristandandi setir meirilutin fram soljóðandi:

## Broytingaruppskot

## til

## uppskot landsstýrisins

1) § 6, stk. 9 verður orðað soleiðis: "Finanstilsynet kan i overensstemmelse med bestemmelserne i Rådets 2. samordningsdirektiv suspendere behandlingen af ansøgninger om godkendelse af pengeinstitutter, som direkte eller indirekte ejes af selskaber med hjemsted indenfor De Europæiske Fællesskaber eller lande, som Fællesskabet har indgået samarbejdsaftale med, og som ikke har indgået en aftale med Færøerne i medfør af § 6 a, stk. 1, eller med hjemsted uden for De Europæiske Fællesskaber eller lande, som Fællesskabet har indgået samarbejdsaftale med."

2) § 6 a, stk. 1, verður orðað soleiðis: "Et udenlandsk kreditinstitut, der er meddelt tilladelse i et andet land inden for De Europæiske Fællesskaber eller lande, som Fællesskabet har indgået samarbejdsaftale med, kan begynde at udøve virksomhed på Færøerne gennem en filial 2 måneder efter, at Finanstilsynet har modtaget meddelelse herom fra tilsynsmyndighederne i hjemlandet, jfr. stk. 2, såfremt der mellem Færøerne og hjemlandet er indgået aftale om, at færøske pengeinstitutter har tilsvarende rettigheder i vedkommende land. Filialen kan udøve de i bilag 1 nævnte aktiviteter, såfremt disse er omfattet af kreditinstituttets tilladelse i hjemlandet."

3) § 6 a, stk. 5, verður orðað soleiðis: "Et udenlandsk kreditinstitut, der er meddelt tilladelse i et land inden for De Europæiske Fællesskaber eller lande, som Fællesskabet har indgået samarbejdsaftale med, kan begynde at udøve virksomhed på Færøerne som grænseoverskridende tjenesteydelser, når Finanstilsynet har modtaget meddelelse herom fra tilsynsmyndighederne i hjemlandet, såfremt der mellem Færøerne og hjemlandet i medfør af stk. 1 er indgået aftale om, at færøske pengeinstitutter har tilsvarende rettigheder i vedkommende land. Kreditinstituttet kan udøve de i bilag 1 nævnte aktiviteter, når hjemlandets tilsynsmyndigheder har erklæret, at disse er omfattet af kreditinstituttets tilladelse i hjemlandet."

4) § 6 b, stk. 1, verður orðað soleiðis: "Et pengeinstitut, hjemmehørende på Færøerne, der ønsker at etablere en filial i et andet land inden for De Europæiske Fællesskaber eller lande, som Fællesskabet har indgået samarbejdsaftale med, og som har indgået en aftale med Færøerne i medfør af § 6 a, stk. 1, skal meddele dette til Finanstilsynet sammen med følgende oplysninger om filialen:

1) i hvilket land filialen ønskes etableret,
2) en beskrivelse af filialens virksomhed, herunder oplysninger om organisation og de planlagte aktiviteter,
3) filialens adresse og
4) navnene på filialens ledelse."

5) § 6 b, stk. 5, verður orðað soleiðis: "Et pengeinstitut, der ønsker at udøve virksomhed i form af grænseoverskridende tjenesteydelser i et andet land inden for De Europæiske Fælllesskaber eller lande, som Fællesskabet har indgået samarbejdsaftale med, og som har indgået en aftale med Færøerne i medfør af § 6 a, stk. 1, skal give Finanstilsynet meddelelse herom med angivelse af, i hvilket land virksomhed ønskes påbegyndt, og hvilke aktiviteter der ønskes udøvet."

6) § 6 c verður orðað soleiðis: "Lovens bestemmelser gælder for filialer af pengeinstitutter, der har hjemsted i et land inden for De Europæiske Fællesskaber eller lande, som Fællesskabet har indgået samarbejdsaftale med og som ikke har indgået en aftale med Færøerne i medfør af § 6 a, stk. 1, og lande uden for De Europæiske Fællesskaber eller lande, som Fællesskabet har indgået samarbejdsaftale med, men de afvigelser, filialforholdet nødvendiggør, eller som er fastsat i eller i medfør af international aftale. Aktieselskabslovens bestemmelser om filialer af udenlandske aktieselskaber gælder tilsvarende for filialer af udenlandske sparekasser og andelskasser."

7) § 7 b, stk. 5, verður orðað soleiðis: "Finanstilsynet kan i overensstemmelse med bestemmelserne i Rådets 2 samordningsdirektiv suspendere behandlingen af en ansøgning om et selskabs direkte eller indirekte erhvervelse af de i stk. 1 fastsatte andele i et pengeinstitut, hvis selskabet ligger i et land inden for De Europæiske Fællesskaber, eller lande, Fællesskabet har indgået samarbejdsaftale med, der ikke har indgået en aftale med Færøerne efter § 6 a, stk. 1 eller med hjemsted uden for De Europæiske Fællesskaber eller lande, som Fællesskabet har indgået samarbejdsaftale med."

8) § 42 verður orðað soleiðis: "Når det sandsynliggøres, at en bank-, sparekasse- eller andelskassebog eller et af et pengeinstitut udstedt indlånsbevis eller modtagelsesbevis er bortkommet, er pengeinstituttet berettiget til ved bekendtgørelse, der indtrykkes i Statstidende i det første nummer i et kvartal, med 3 måneders varsel at indkalde ihændehaveren eller på samme måde ved bekendtgørelse i det på Færøerne til offentlige bekendtgørelser autoriserede blad i det første nummer i et fjerdingsår. Hvis ingen melder sig, kan pengeinstituttet udbetale, hvad der skyldes efter bank-, sparekasse- eller andelskassebogen eller beviset, til den, der efter pengeinstituttets bøger er fordringshaver."

9) § 44 b verður orðað soleiðis: "Finanstilsynet kan efter de procedurer, der er fastsat i EF-direktiver om kreditinstitutter, forbyde et udenlandsk kreditinstitut med hjemsted i et andet land inden for de Europæiske Fællesskaber eller lande, som Fællesskabet har indgået samarbejdsaftale med, og som har indgået en aftale med Færøerne i medfør af § 6 a, stk. 1., at udøve virksomhed på Færøerne gennem en filial eller i form af grænseoverskridende tjenesteydelser, hvis instituttet groft eller gentagne gange har overtrådt bestemmelser i denne lov, regler udfærdiget i medfør af loven eller anden lovgivning, der retter sig mod finansiel virksomhed, og det ikke ved påbud eller sanktioner efter denne lov har været muligt at bringe overtrædelserne til ophør."

10) § 50, stk. 2, verður orðað soleiðis: "Tilsynsmyndighederne i et andet land inden for De Europæiske Fællesskaber eller lande, som Fællesskabet har indgået samarbejdsaftale med, og som har indgået en aftale med Færøerne i

medfør af § 6 a, stk. 1, kan efter forudgående meddelelse herom til Finanstilsynet foretage inspektion i det på Færøerne beliggende filialer af udenlandske kreditinstitutter med hjemsted i det pågældende land."

11) § 56, stk. 10, verður orðað soleiðis: "Inden 1 år efter denne lovs ikrafttræden skal enhver bank eller sparekasse, som ikke er under likvidation, have foretaget de vedtægtsændringer, der nødvendiggøres af loven. Vedtægtsændringer, som er nødvendige for at bringe vedtægterne i overensstemmelse med forskrifterne i denne lov, men som ikke har opnået vedtagelse på en generalforsamling, skal anses som gyldigt vedtaget af generalforsamlingen, såfremt der på denne ikke er afgivet så stort et antal stemmer imod ændringerne, som efter vedtægterne udkræves til beslutning af pengeinstituttets opløsning."

**Til lóg um vinnurekandi grunnar:**

Rættarnevndin hevur havt samrøðu við Jógvan Páll Lassen adv., sum hevur verið formaður í arbeiðsbólki at endurskoða lógina. Lógin hevur ikki stórvegis týdning í Føroyum, eftir sum ongir grunnar eru, sum eru umfataðir av lógini uttan Føroyagrunnurin, "Finansieringsfonden af 1992" og "Strukturfonden for Færøerne". Ríkismyndugleikarnir hava stillað seg positivt til, at hesir grunnar verða undantiknir lógini, jvb. § 1, stk. 4 og 5, eftir sum teir allir eru undir øðrum almennum eftirliti.

Í avtaluni við donsku stjórnina er ásett, at allur ella partar av myndugleikanum, sum sambært lógini er tillutaður "Erhvervs- og Selskabsstyrelsen" eftir avtalu millum "Erhvervs- og Selskabsstyrelsen" og føroyska skrásetingarmyndugleikan kann flytast til føroyska skrásetingarmyndugleikan. Meirilutin skjýtur upp, at hetta eisini verður ásett í lógini.

Meirilutin tekur annars undir við uppskoti landsstýrisins, men mælir til, at § 4, stk. 1, í lógini verður broytt, soleiðis at loyvt skal verða vinnurekandi grunnum at rópa seg annaðhvørt "fond" ella "grunnur", og at gildiskomutíðspunktið verður broytt til 1. januar 1994.

Meirilutin setir tí fram soljóðandi:

## Broytingaruppskot

## til

## uppskot landsstýrisins

1) § 4, stk. 1 verður orðað soleiðis: "Erhvervsdrivende fonde skal i deres navn benytte ordet "fond" eller tilsvarende på færøsk: "grunnur".

2) Sum nýggj § 58 a verður sett: "De beføjelser, der efter denne lov tilkommer Erhvervs- og Selskabsstyrelsen, kan efter aftale mellem styrelsen og Færøernes Landsstyre i nærmere bestemt omfang overlades en færøsk registreringsmyndighed."
3) Í § 65, stk. 1, verður "Loven træder i kraft den 1. januar 1985" broytt til: "Loven træder i kraft den 1. januar 1994."

**Til lóg um ávísar fíggjarstovnar:**

Sambært viðmerkingunum hjá landsstýrinum eru eingir fíggjarstovnar í Føroyum, sum eru umfataðir av lógini.

Rættarnevndin hevur havt samrøðu við Kjartan Kristiansen, stjóra á Menningarstovuni, sum hevur arbeitt við at fáa lógina setta í gildi. Menningarstovan heldur, at vantandi lóggáva á økinum hevur forðað fyri, at settur hevur verið á stovn fíggingarstovnur samsvarandi "Finansieringsinstituttet for Industri og Håndværk". Møguleikin hjá føroyskum vinnufyritøkum at stovna slíkan stovn er til staðar, sjálvt um lógin ikki er í gildi, men ringt er hjá stovninum at útvega neyðugan útlánskapital við at selja peningastovnunum lánsbrøv, orsakað av, at tey lánsbrøv, sum stovnurin hevði givið út, høvdu – sum onnur privat útlán – verið vektað við 1,0. Um stovnurin hevði verið undir eftirliti av Finanstilsynet, høvdu lánsbrøvini verið vektað við 0,2, samsvarandi lánsbrøvunum frá FIH.

Tey broytingaruppskot, sum landsstýrið hevur skotið upp, eru grundað á somu sjónarmið sum broytingaruppskotini til banka- og sparikassalógina um at fíggingarstovnar í Føroyum skulu hava somu møguleikar at stovnseta deildir í EF, sum fíggingarstovnar í EF hava at stovnseta deildir í Føroyum.

Meirilutin tekur undir við uppskotinum hjá landsstýrinum.

**Til lóg um partafeløg:**

Lógin hevur í mun til galdandi føroysku lógina um partafeløg meira útgreinaðar reglur um teknisk viðurskifti, so sum stovnan og skráseting av partafeløgum, inngjalding, hækking og lækking av partapeningi, innkalling av aðalfundinum o.s.fr. Haraftrat hevur hon nýggjar reglur við meira politiskum innihaldi. Hesar eru í høvðusheitum reglur um alment innlit í, hvør eigur partabrøv í felagnum, og reglur um nevndarumboð fyri starvsfólkið.

Meirilutin tekur undir við reglunum um tey meira teknisku viðurskiftini. Dentur verður í hesum sambandi lagdur á, at ásetingin um, at partapeningurin skal vera í minsta lagi 500.000 kr. ikki kemur í gildi fyrr enn 3 ár eftir, at lógin er komin í gildi.

Somuleiðis tekur meirilutin undir við, at nýggju reglurnar við meira politiska innihaldinum verða settar í gildi, eftir sum hesar hava víst seg at hava virkað væl aðrastaðni. Nevnast kann, at tá reglurnar um starvsfólkaumboðan í síni tíð vóru í umbúna í Danmark, vóru hørð mótmæli í móti teimum. Síðani eru mótmælini linkað, og taka nú sjálvt arbeiðsgevarafeløgini undir við skipanini við starvsfólkaumboðan.

Landsstýrið hevur skotið upp at strika reglurnar, sum snúgva seg um "værdipapircentralen", og um "Københavns Fondsbørs". Lógin um "værdipapircentral" er sett í gildi í Føroyum við "Anordning nr. 801 af 28. september 1992", og einki er til hindurs fyri, at føroysk feløg verða tikin upp til notering á "Københavns Fondsbørs". Meirilutin heldur tað tí ikki vera nakra grund til at strika hesar reglur.

Meirilutin heldur tað ikki vera neyðugt, at almennar kunngerðir viðvíkjandi partafeløgum skulu lýsast í "Statstidende" og skjýtur tí upp, at tilvísingarnar til "Statstidende" verða broyttar til: "det på Færøerne til offentlige bekendtgørelser autoriserede blad".

Meirilutin vísir eisini til avtaluna við donsku stjórnina um, at myndugleikin, sum sambært lógini er tillutaður "Erhvervs- og Selskabsstyrelsen" eftir avtalu millum "Erhvervs- og Selskabsstyrelsen" og føroyska skrásetingarmyndugleikan, kann flytast til føroyska skrásetingarmyndugleikan. Tað verður tí ikki hildið at vera rætt, at myndugleikin hjá føroyska skrásetingarmyndugleikanum verður ásettur beinleiðis í lógini. Samsvarandi broytingaruppskotinum til uppskot landsstýrisins um ígildissetan av lóg um vinnurekandi grunnar skjýtur meirilutin upp, at tað í lógini verður ásett, at myndugleikin, sum sambært lógini er tillutaður "Erhvervs- og Selskabsstyrelsen", eftir avtalu við landsstýrið kann flytast til ein føroyskan skrásetingarmyndugleika.

Meirilutin hevur eisini uppskot til málsligar rættingar í uppskotinum hjá landsstýrinum.

Samsvarandi omanfyristandandi setir meirilutin fram soljóðandi:

**Broytingaruppskot**

**til**

**uppskot landsstýrisins**

1) Í § 3, stk. 2, verður: "Danske kommuner", broytt til: "landsstyret, kommuner".
2) §§ 23 a, 23 b, 23 c og 23 d verða ikki strikaðar.
3) Í § 28 b, stk. 3 verður "Industriministeren" broytt til: "Landsstyret".

**4)** § 28 c verður ikki strikað.

**5)** Í § 20 c, stk. 1 og 3, § 32, stk. 1, nr. 4, § 34, stk. 2, § 40, § 62. § 134 1, stk. 2 og 4, § 158 og § 158 a verður "Dimmalætting" broytt til: "det på Færøerne til offentlige bekendtgørelser autoriserede blad".

**6)** § 41 a verður ikki strikað.

**7)** § 51, stk. 3, verður ikki strikað.

**8)** Í § 52, stk. 2, verður "industriministeren" broytt til: "landsstyret".

**9)** § 56, stk. 5, verður ikki strikað.

**10)** § 76, stk. 3, verður ikki strikað.

**11)** § 117 og § 123: Sí omanfyri undir pkt. 5.

**12)** § 147 verður orðað soleiðis: "Udenlandske aktieselskaber, kommanditselskaber og selskaber med en tilsvarende retsform kan drive virksomhed gennem en filial her i landet, hvis dette er hjemlet i international aftale, eller når landsstyret skønner, at der indrømmes færøske selskaber tilsvarende ret i vedkommende land, eller iøvrigt giver tilladelse hertil."

**13)** Í § 149, stk. 1, verður "Industriministeren" broytt til: "Landsstyret".

**14)** Í § 150 verður aftan á "dansk" sett: "og færøsk".

**15)** § 153, stk. 1, verður orðað soleiðis: "Aktieselskaber er pligtige og eneberettigede til i deres navn at benytte ordet "aktieselskab" eller forkortelsen "A/S" eller tilsvarende på færøske "partafelag" eller forkortelsen "P/f".

**16)** § 159 a verður ikki broytt.

**17)** §§ 176 og 178 verða ikki broyttar.

**18)** Sum nýggj § 179 verður sett: "De beføjelser, der efter denne lov tilkommer Erhvervs- og Selskabsstyrelsen, kan efter aftale mellem styrelsen og Færøernes Landsstyre i nærmere bestemt omfang overlades en færøsk registreringsmyndighed."

**Til lóg um smápartafeløg:**

Víst verður sum heild til viðmerkingarnar omanfyri. Reglurnar í lógunum um smápartafeløg og partafeløg eru í stóran mun tær somu, tó soleiðis at reglurnar um partafeløg eru nakað meira útgreinaðar.

Nakrir munir av týdningi eru tó. Sambært uppskotinum um ígildissetan av smápartafelagslógini, skal smápartapeningurin vera í minsta lagi 80.000 kr., meðan partafelagspeningurin sambært uppskotinum um ígildissetan av partafelagslógini skal vera í minsta lagi 500.000 kr.

Somuleiðis kann nevnast, at aðalfundur smb. § 85 a í smápartafelagslógini skal verða hildin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir, at helvtin av smápartafelagspeningingum er mistur, og skal nevndin tá koma við uppskoti, sum hevur við sær, at allur smápartafelagspeningurin verður vunnin inn aftur, ella koma við uppskoti um at taka felagið av. Samsvarandi reglan í partafelagslógini § 69 a ásetir bert, at

nevndin skal kalla inn til aðalfundar fyri at viðgera støðuna, og merkir hetta, at eitt partafelag ikki hevur skyldu til at gevast, sjálvt um partur ella kanska allur partapeningurin er mistur. § 85 a í smápartafelagslógini kemur sambært uppskotinum ikki í gildi fyrr enn 5 ár eftir, at lógin er komin í gildi.

Samsvarandi omanfyristandandi setir meirilutin fram soljóðandi:

## Broytingaruppskot
## til
## uppskot landsstýrisins

1) Í § 3, stk. 2 verður "landsstyret og kommuner" broytt til: "landsstyret, kommuner".
2) Í § 14 e, stk. 1 og 3, § 43, § 109 a, stk. 1 og 3, § 128 og 128 a verður "Dimmalætting" broytt til: "det på Færøerne til offentlige bekendtgørelser autoriserede blad".
3) I §§ 28 og 92 verður "Statstidende og Dimmalætting" broytt til: "det på Færøerne til offentlige bekendtgørelser autoriserede blad".
4) § 117 verður orðað soleiðis: "Udenlandske anpartsselskaber og selskaber med en tilsvarende retsform kan drive virksomhed gennem en filial her i landet, hvis dette er hjemlet i international aftale, eller når landsstyret skønner, at der indrømmes færøske selskaber tilsvarende ret i vedkommende land, eller iøvrigt giver tilladelse hertil".
5) Í § 119, stk. 1, verður "industriministeren" broytt til: "landsstyret".
6) Í § 120 verður aftan á "dansk" sett: "og færøsk".
7) § 129 a verður ikki broytt.
8) Sum nýggj § 129 c verður sett: "De beføjelser, der efter denne lov tilkommer Erhvervs- og Selskabsstyrelsen, kan efter aftale mellem styrelsen og Færøernes Landsstyre i nærmere bestemt omfang overlades en færøsk registreringsmyndighed.
9) §§ 134, 137 og 138 verða ikki broyttar.

**Til lóg um framløgu av ársroknskapi hjá ávísum feløgum v.m.:**

Núverandi lóggáva á økinum eru §§ 41 - 45 í partafelagslógini.

Við so fáum reglum á økinum er vandi fyri, at ringt er at samanbera roknskapir hjá fleiri virkjum, og sjálvt innan fyri sama virki kann tað koma fyri, at ringt er at samanbera roknskapir fyri ymisk ár.

Føroyskir grannskoðarar hava tó í roynd og veru sett roknskapirnar upp eftir sama leisti. Ein viðvirkandi orsøk til hetta er ivaleyst, at flest allir grannskoðarar

hava lisið somu lærubøkur, tá teir nomu sær útbúgving. Eingin trygd er tó fyri,at felagið góðtekur roknskaparuppsetingina, sum grannskoðarin skjýtur upp.

Tað má metast sum sera ópraktiskt, at ikki altíð ber til at samanbera roknskapir, serliga í eini tíð, hvar altjóða samskifti verður alt størri, og reglurnar um roknskaparuppseting í EF og annars í londunum kring okkum alt meira verða gjørdar eins.

Meirilutin kann tí taka undir við teimum meiri teknisku reglunum í uppskotinum hjá landsstýrinum um eina ársroknskaparlóg, sum ikki bert er galdandi fyri partafeløg, men flest øll vinnufeløg við meiri útgreinaðum reglum (herundir krøvunum um ársfrágreiðing, notum og um konsernroknskapir), og sum eisini eru í tráð við reglurnar aðrastaðni.

Haraftrat ásetir lógin í § 73, stk. 4, at roknskapirnir sknlu skrásetast og liggja soleiðis, at øll kunnu hyggja at teimum. Eftir galdandi lóggávu er hetta bert galdandi fyri roknskapir hjá partafeløgum, sum hava fleiri enn 10 partaeigarar. Meirilutin dugir tó ikki at síggja vandan við eisini at seta hesa regluna í gildi, serliga tá hugsað verður um royndirnar av slíkum reglum aðrastaðni.

Meirilutin vísir til avtaluna við donsku stjórnina um, at myndugleikin, sum sambært lógini er tillutaður "Erhvervs- og Selskabsstyrelsen" eftir avtalu millum "Erhvervs- og Selskabsstyrelsen" og føroyska skrásetingarmyndugleikan kann flytast til føroyska skrásetingarmyndugleikan. Tað verður tí ikki hildið at vera rætt, at myndugleikin hjá føroyska skrásetingarmyndugleikanum verður ásettur beinleiðis í lógini.

Danska stjórnin hevur seinni góðtikið, at lógin vísir til føroyska skrásetingarmyndugleikan, tá talan er um reinar skrásetingaruppgávur, og mælir meirilutin til at taka undir við uppskoti landsstýrisins um, at lógin í hesum førum beinleiðis vísir til føroyska skrásetingarmyndugleikan.

Meirilutin hevur eisini uppskot til málsligar rættingar í uppskoti landsstýrisins.

Vísandi til omanfyristandandi setir meirilutin fram soljóðandi:

## Broytingaruppskot

## til

## uppskot landsstýrisins

1) Í § 5, stk. 1, 3. pkt., § 25, stk. 1, § 40, stk. 3, § 61, § 61 b, stk. 5, § 64, stk. 1, verða ikki broyttar.
2) Í § 61 a verður "Færøernes Landsstyre" broytt til "den færøske registreringsmyndighed" og "den på Færøernes autoriserede kundgørelsesavis" broytt til: "det på Færøerne til offentlige bekendtgørelser autoriserede blad".

3) Í § 61, f, stk. 1, verður "løggildugar grannskoðarar" broytt til "løggildar grannskoðarar".
4) § 63 a, stk. 3, verður strikað.

Ein minniluti (Lisbeth L. Petersen) tekur støðu í tingsalinum.

Ein annar minniluti (Signar Hansen) førir fram:

Tá ið løgtingsmál – nr. 93/92: Løgtingslóg um lántøku til landskassan – varð viðgjørt av løgtinginum, førdi Tjóðveldisflokkurin fram, at danska stjórnin misbrúkar ta torføru búskaparstøðuna í Føroyum til at taka ræðið yvir allari umsiting, vinnulívi og lóggávuvaldi í Føroyum uttan formelt at seta heimastýrislógina úr gildi.

Í dag mugu vit ásanna, at ríkisstjórnin gjøgnum síni umboð stýrir tí føroyska vinnulívinum, og løgtingið og landsstýrið hava lítið og einki at siga longur.

*Tingmálini nr. 153/92: Ígildissetan í Føroyum av lógarkunngerð "om banker og sparekasser".,*
*mál nr. 154/92: Ígildissetan í Føroyum av lógarkunngerð um "erhvervsdrivende fonde".,*
*mál nr. 155/92: Ígildissetan í Føroyum av lógarkunngerð "om visse kreditinstitutter".,*
*mál nr. 156/92: Ígildissetan í Føroyum av lógarkunngerð "om aktieselskaber".,*
*mál nr. 157/92: "Ígildissetan í Føroyum av lógarkunngerð "om anpartsselskaber."*
*og mál nr. 158/92: Ígildissetan í Føroyum av lógarkunngerð "om visse selskabers aflæggelse af årsregnskab m.v.",*

hava ikki fingið nakra nágreiniliga viðgerð í rættarnevndini, helst av teirri orsøk, at samgongan hevur yvirfyri dønum frammanundan bundið seg til at seta nevndu lógir í gildi fyri Føroyar, uttan fyrst at hava kannað eftir, um nevndu lógir eru tær best egnaðu til tað føroyska samfelagið. Eisini hetta er eitt prógv um, at danir hava tikið ræðið yvir lóggávuvaldinum í Føroyum uttan formelt at hava sett heimastýrislógina úr gildi.

Tjóðveldisflokkurin finst harðliga at framferð landsstýrisins í hesum máli, tá ið tað á fundi í Keypmannahavn fylgir harraboðum dana um at samtykkja danskar lógir í Føroyum uttan at fyrst at kanna eftir, um tær eru tær best egnaðu til okkara samfelag.

Tjóðveldisflokkurin tekur ikki undir við framløgdu uppskotum landsstýrisins, men vísir harafturímóti til uppskot floksins á tingi, ið mælir til, at samráðingar verða við ríkisstjórnina um, at allur avgerðarrættur í Føroyum, inneftir og úteftir, og allar skyldur skulu í framtíðini liggja hjá Føroya fólki, hjá tí fólkavalda løg-

tinginum og hjá løgtingsins umsitingarvaldi, og at avtala verður gjørd um at avgreiða fíggjar- og búskaparviðurskiftini landanna millum, ið ber í sær, at føroyska samfelagið kann fóta sær aftur fíggjar- og búskaparliga, samstundis sum hon eftir rímuligari tíð sleppur ríkiskassanum undan at lata føroyska samfelagnum árligan fíggjarligan stuðul.

Uppskot Tjóðveldisflokksins fekk undir fyrstu viðgerð eina góða móttøku, ikki bert frá andstøðuflokkunum, men eisini frá tingmonnum í samgonguni, tí er tað nógv, sum bendir á, at málið vinnur frama á Føroya Løgtingi, og nýggjar samráðingar verða við ríkisstjórnina um, at allur avgerðarrættur í Føroyum, inneftir og úteftir, og allar skyldur skulu í framtíðini liggja hjá Føroya fólki, hjá tí fólkavalda løgtinginum og hjá løgtingsins umsitingarvaldi.

Tjóðveldisflokkurin tekur ikki undir við framløgdu uppskotum landsstýrisins, men vísir til uppskot floksins í tingmáli nr. 144/92: Samráðingar við ríkisstjórnina.

# 154. Ígildissetan í Føroyum av lógarkunngerð um "erhvervsdrivende fonde"

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið mælir ríkismyndugleikunum til, at lógarkunngerð nr. 75 frá 18. november 1991 "om erhvervsdrivende fonde" verður sett í gildi í Føroyum.

# 155. Ígildissetan í Føroyum av lógarkunngerð "om visse kredittinstitutter"

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið mælir ríkismyndugleikunum til, at lógarkunngerð nr. 737 frá 19. august 1992 "om visse kreditinstitutter", sum broytt við lóg nr. 1061 frá 23. desember 1992, verður sett í gildi í Føroyum við hesum broytingum:

**1.** *§ 2, stk. 2, verður broytt til:*

"Tilladelse forudsætter, at de af Industriministeriet fastsatte betingelser samt de betingelser, som er fastsat i eller i medfør af international aftale, opfyldes."

**2.** *§ 2, stk. 4, verður broytt til:*

"De i lov om banker og sparekasser m.v. fastlagte bestemmelser og procedurer om danske og færøske pengeinstitutter filialer..."

**3.** *§ 7, stk. 1, verður broytt til:*

"Loven træder i kraft 1. januar 1994."

**4.** *§ 5 í lóg nr. 306 frá 16. mai 1990 verður broytt soleiðis:*

"En filial af et udenlandsk kreditinstitut, der har hjemsted i et andet land inden for De Europæiske Fællesskaber, som har indgået en aftale med Færøerne i medfør af § 6 a i lov om banker og sparekasser, og som ...."

**Viðmerkingar:**

Broytingin í lóg nr. 1061 frá 23. desember 1992 er, at orðini "for kreditinstitutter og deres datterselskaber" í § 5 stk. 1, nr. 9) ganga út.

EF-direktiv frá 12. desember 1977 áskrivar, at limalondini skulu broyta teirra lóggávu viðvíkjandi fíggingarstovnum, m.a. soleiðis, at tað ikki skal vera loyvt at

reka vinnu sum fíggingarstovnur uttan loyvi frá almennari síðu, sum bert kann verða givið, um ávísar treytir, sum eru upproknaðar í direktivinum, eru loknar.

Ein gjøgnumgongd av lógargrundarlagnum fyri donsku peninga- og realkreditstovnunum vísti, at umframt broytingar í banka- og sparikassalógini, var neyðugt at gera eina serliga lóg um ávísar fíggingarstovnar, sum skuldi umfata allar fíggingarstovnar, sum ikki vóru umfataðir av banka- og sparikassalógini, realkreditlógini, aðrari lóg, og sum ikki vóru bankiervirki ella "andelskassar".

Lógin umfatar sostatt fíggingarstovnar, sum ikki áður hava verið undirgivnir nakrari lóg, t.d. fíggingarfeløg, sum eru stovnað av vinnufeløgum e.ø. við atliti at fígging av virkjum innanfyri avvarðandi vinnuøki.

Í 1985 vóru 8 danskir stovnar umfataðir av lógini, heruppií "Finansieringsinstituttet for Industri og Håndværk A/S". Hesir stovnar høvdu tá javnar upp á millum 4,7 mió kr. til umleið 10 mia. kr.

Í Føroyum er ongin slíkur fíggingarstovnur, sum vildi verið umfataður av lógini.

Tilvísingarnar í donsku lógini til ársroknskaparlógina skulu justerast, um so er, at ein serføroysk lóg verður gjørd á hesum øki.

Landsstýrið ætlar at seta donsku ársroknskaparlógina í gildi við kongaligari fyriskipan, og tí verður ikki neyðugt við broytingum í donsku lógini á hesum øki.

Skotið verður upp, at danka lógin "om visse kreditinstitutter" verður sett í gildi í Føroyum frá 1. januar 1994.

# 156. Ígildissetan í Føroyum av lógarkunngerð "om aktieselskaber"

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið mælir ríkismyndugleikunum til, at lógarkunngerð nr. 659 frá 25. september 1991 "om aktieselskaber", sum broytt við lóg nr. 886 frá 21. desember 1991 og lóg nr. 1060 frá 23. desember 1992 verður sett í gildi í Føroyum við hesum broytingum:

1. § 3, stk. 2: "danske kommuner" verður strikað og í staðin verður sett "landsstyret og kommuner".

**2.** §§ 23 a, 23 b, 23 c og 23 d verða strikaðar.

**3.** § 28 b: "Industriministeriet" verður broytt til: "landsstyret".

**4.** § 28 c verður strikað.

**5.** § 20 c, § 32 nr. 4, § 34, stk. 2, § 40, § 62, § 134 1, § 158, § 158 a: "Statstidende" verður broytt til: "Dimmalætting".

**6.** § 41 a verður strikað.

**7.** § 51, stk. 3 verður strikað.

**8.** § 52, stk. 2: "industriministeriet" verður broytt til: "landsstyret".

**9.** § 56, stk. 5 verður strikað.

**10.** § 76, stk. 3 verður strikað.

**11.** § 117 og § 123: Aftan á "Statstidende" verður sett: "og Dimmalætting".

**12.** § 147 verður orðað soleiðis:

"Udenlandske aktieselskaber, kommandit-, aktieselskaber og selskaber med en tilsvarende retsform, der er hjemmehørende i en af de Europæiske Fællesskabers medlemsstater, samt fra andre lande, kan drive virksomhed gennem en filial her i landet, hvis dette er hjemlet i international aftale, eller når landsstyret skønner, at der indrømmes færøske selskaber tilsvarende ret i vedkommende land, eller iøvrigt giver tilladelse hertil.

**13.** § 150: Aftaná "dansk" verður sett: "/færøsk".

**14.** § 152, nr. 4: "der ikke er hjemmehørende i en af De Europæiske Fællesskabers medlemsstater" verður strikað.

**15.** § 153: Aftan á "forkortelser" verður sett: "på dansk eller færøsk".

**16.** § 159 a: "industriministeren" og "ministeren" verða broytt til: "landsstyret".

**17.** § 162, stk. 1, verður orðað soleiðis:
"Loven træder i kraft den 1. januar 1994".

**18.** Sum nýggj stk. 4 og 5 í § 162 verða sett:

"**Stk. 4.** Bestemmelserne i § 69 a, hvorefter bestyrelsen skal foranledige, at generalforsamlingen afholdes inden 6 måneder efter, at selskabet har tabt halvdelen af sin aktiekapital, finder først anvendelse 5 år efter lovens ikrafttræden.

**Stk. 5.** Er et selskab inden lovens ikrafttræden trådt i likvidation efter lovgivningens bestemmelser om likvidation af insolvente selskaber, anvendes de hidtil gældende regler om virkningerne heraf."

**19.** §§ 164 og 165 verða orðaðar soleiðis:
"§ 164. De ved lovens ikrafttræden registrerede aktieselskaber, som ikke er under likvidation eller konkursbehandling, skal:

1) inden tre år efter lovens ikrafttræden bringe deres aktiekapital op på det i § 1 omhandlede mindstebeløb af 500.000 kr.

2) inden to år efter lovens ikrafttræden bringe deres vedtægter i øvrigt i overensstemmelse med lovens krav, jfr. dog §§ 166 og 169.

**Stk. 2.** Vedtægtsændringer, som Erhvervs- og Selskabsstyrelsen finder nødvendige for at bringe vedtægterne i overensstemmelse med forskrifterne i denne lov, jfr. stk. 1 og § 49, stk. 1, 2. pkt., og som ikke på selskabets generalforsamling har opnået det til deres gennemførelse vedtægtsmæssigt fornødne stemmetal, skal anses som gyldigt vedtagne af generalforsamlingen, såfremt der på denne ikke er afgivet så stort et antal stemmer imod ændringerne, som efter vedtægterne udkræves til beslutning om selskabets opløsning.

**Stk. 3.** Er selskabets vedtægter ikke bragt i overensstemmelse med loven inden den i stk. 1 angivne frist, og foretager selskabet ikke de fornødne ændringer efter krav fra Erhvervs- og Selskabsstyrelsen, foranlediger Erhvervs- og Selskabsstyrelsen selskabet opløst, om fornødent efter reglerne i § 117.

**§ 165.** Aktieselskaber, der ikke er registreret, men anmeldt før lovens ikrafttræden, skal inden registreringen bringe deres vedtægter i overensstemmelse med lovens krav."

**20.** §§ 176 og 178: "Industriministeren" verður broytt til:
"landsstyret".

**Viðmerkingar:**

Víst verður til viðmerkingarnar í hjálagda áliti til nýggja partafelagslóg fyri Føroyar.

# 157. Ígildissetan í Føroyum av lógarkunngerð "om anparts-selskaber"

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið mælir ríkismyndugleikunum til, at lógarkunngerð nr. 660 frá 25. september 1991 "om anpartsselskaber", sum broytt við lóg nr. 886 frá 21. desember 1991 og lóg nr. 1060 frá 23. desember 1992 verður sett í gildi í Føroyum við hesum broytingum:

1. § 1, stk. 3: "kr. 200.000,-" verður broytt til: "kr. 80.000,-".
2. § 3, stk. 2: "danske kommuner" verður strikað og í staðin verður sett: "landsstyret og kommuner".
3. Í §§ 14 e, 43, 109 a, 128 og 128 a verður "Statstidende" broytt til: "Dimmalætting".
4. §§ 28, 92 og 117: Aftan á "Statstidende" verður sett: "og Dimmalætting".
5. § 34: "industriministeren" verður broytt til: "landsstyret".
6. § 117 verður orðað soleiðis:

   "Udenlandske anpartsselskaber og selskaber med en tilsvarende retsform, der er hjemmehørende i en af De Europæiske Fællesskabers medlemsstater, samt fra andre lande, kan drive virksomhed gennem filial her i landet, hvis dette er hjemlet i international aftale, eller når landsstyret skønner, at der indrømmes færøske selskaber tilsvarende ret i vedkommende land, eller iøvrigt giver tilladelse hertil."
7. § 120: Aftan á "dansk" verður sett: "/færøsk".
8. § 122, 4): "der ikke er hjemmehørende i en af De Europæiske Fællesskabers medlemsstater" verður strikað.
9. § 123: Aftan á "ApS" verður sett: "eller tilsvarende på færøsk "smápartafelag" eller forkortelsen "Sp/f".
10. § 129 a: "industriministeren" og "ministeren" verða broytt til: "landsstyret".
11. § 132 verður orðað soleiðis:

"Loven træder i kraft den 1. januar 1994. Bestemmelserne i nærværende lovs § 85 a finder først anvendelse 5 år efter lovens ikrafttræden."

**12.** §§ 134, 137 og 138: "industriministeren" verður broytt til: "landsstyret".

**Viðmerkingar:**

Víst verður til viðmerkingarnar í viðlagda áliti til nýggja partafelagslóg fyri Føroyar.

# 158. Ígildissetan í Føroyum av lógarkunngerð "om visse selskabers aflæggelse af årsregnskab m.v."

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið mælir ríkismyndugleikunum til, at lógarkunngerð nr. 661 frá 25. september 1991 "om visse selskabers aflæggelse af årsregnskab m.v.", sum broytt við lóg nr. 1059 frá 23. desember 1992 og lóg nr. 1060 frá 23. desember 1992 verður sett í gildi í Føroyum við hesum broytingum:

1. Í § 2 a, stk. 1 ganga orðini: "en fondsbørs i en stat, der er medlem af De Europæiske Fællesskaber" út, og ístaðin verða orðini: "Københavns Fondsbørs" sett.
2. Í § 2 a, stk. 1, nr. 2 ganga orðini: "i en stat, der er medlem af De Europæiske Fællesskaber, og som udarbejdes og revideres efter lovgivningen i denne medlemsstat" út, og ístaðin verða orðini: "i en anden del af det danske rige, og som udarbejdes og revideres efter lovgivningen i denne del" sett.
3. Í § 2 a, stk. 1, nr. 4 ganga orðini: "Erhvervs- og Selskabsstyrelsen" út, og ístaðin verða orðini: "den færøske registreringsmyndighed" sett.
4. Í § 2 a, stk. 2 ganga orðini: "Erhvervs- og Selskabsstyrelsen" út og ístaðin verða orðini: "Den færøske registreringsmyndighed" sett.
5. Í § 2 c, stk. 1 verða orðini "en fondsbørs i en stat, der er medlem af De Europæiske Fællesskaber" broytt til: "Københavns Fondsbørs".

6. Í § 2 e, stk. 2, nr. 1 verða orðini "stat, der er medlem af De Europæiske Fællesskaber" broytt til: "anden del af det danske rige".
7. Í § 2 c, stk. 2, nr. 3, verða orðini "Erhvervs- og Selskabsstyrelsen" broytt til: "den færøske registreringsmyndighed".
8. § 2 f verður strikað.
9. Í § 5, stk. 1, 4. pkt., verður "Industriministeren" broytt til: "Færøernes Landsstyre".
10. Í § 25. stk. 1, verður "industriministeren" broytt til: "Færøernes Landsstyre".
11. Í § 40, stk. 3 verður "Industriministeren" broytt til: "Færøernes Landsstyre".
12. § 47 verður strikað.
13. Í § 56, stk. 3, nr. 2, verður orðið "danske" strikað og aftan á "aktieselskaber" verður sett: "i det danske rige".
14. Í § 61 verður "industriministeren" broytt til: "Færøernes Landsstyre".
15. Í § 61 a, stk. 2, 1. pkt. verður "Erhvervs- og Selskabsstyrelsen" broytt til: "den færøske registreringsmyndighed". Í 2. pkt. verður "Erhvervs- og Selskabsstyrelsen" broytt til: "Færøernes Landsstyre". Í pkt. 3 verður "Statstidende" broytt til: "den på Færøerne autoriserede kundgørelsesavis", og í 4. pkt. verður "Erhvervs- og Selskabsstyrelsen" broytt til: "Den færøske registreringsmyndighed".
16. Í § 61 b, stk. 5, verður "Industriministeren" broytt til: "Færøernes Landsstyre" og "1990" verður broytt til: "1994".
17. Í § 61 e, stk. 1, 3. pkt., verður "Erhvervs- og Selskabsstyrelsen" broytt til: "den færøske registreringsmyndighed".
18. Í § 61 f, stk. 1, verður "statsautoriserede revisorer" broytt til: "løggildugar grannskoðarar", "registrerede revisorer" verður broytt til: "skrásettar grannskoðarar" og "Erhvervs- og Selskabsstyrelsen" verður broytt til: "den færøske registreringsmyndighed".
19. Í § 61 f, stk. 2, verður "Erhvervs- og Selskabsstyrelsen" broytt til: "den færøske registreringsmyndighed".
20. Í § 62, stk. 1, verður "Erhvervs- og Selskabsstyrelsen" broytt til: "den færøske registreringsmyndighed".
21. § 62, stk. 4, verður orðað soleiðis: "Stk. 4. De modtagne årsregnskaber m.v. er offentligt tilgængelige."
22. Í § 62 a verður "Erhvervs- og Selskabsstyrelsen" broytt til: "den færøske registreringsmyndighed".
23. Í § 62 b verður "Erhvervs- og Selskabsstyrelsen" broytt til: "den færøske registreringsmyndighed". Orðini "Oplysningerne offentliggøres i styrelsens edb-informationssystem" verða strikað.
24. Í § 62 b, stk. 2, verður "§§ 2 e og 2 f" broytt til: "§ 2 e".

**25.** Í § 63, stk. 2, verður "Erhvervs- og Selskabsstyrelsen" broytt til: "den færøske registreringsmyndighed" í báðum førum.

**26.** Í § 63 a, stk. 1, verður "Erhvervs- og Selskabsstyrelsen" broytt til: "den færøske registreringsmyndighed".

**27.** Í § 63 a, stk. 3, verða orðini "de henhører under lovgivningen i en stat, der er medlem af De Europæiske Fællesskaber" strikað.

**28.** § 63 b verður orðað soleiðis:

"§ 63 b. Et udenlandsk selskab kan, hvis det er i overensstemmelse med den lovgivning, der gælder for selskabet, i stedet for sit årsregnskab m.v. til den færøske registreringsmyndighed indsende et koncernregnskab for en modervirksomhed, hvis:

1) alle selskabets virksomhedsdeltagere har erklæret sig indforstået med fremgangsmåden,
2) modervirksomheden indestår for selskabets forpligtelser,
3) fremgangsmåden oplyses i noterne til nævnte koncernregnskab og
4) at koncernregnskab med koncernberetning og revisionspåtegning indsendes til den færøske registreringsmyndighed sammen med de i nr. 1 og nr. 2 omhandlede erklæringer og
5) den færøske registreringsmyndighed skønner, at koncernregnskabet er udarbejdet i overensstemmelse med de efter denne lov gældende regler for koncernregnskaber.

**Stk. 2.** Erklæringen efter stk. 1, nr. 1, skal indsendes for hvert regnskabsår. Erklæringen efter stk. 1, nr. 2, er gældende, til den bliver tilbagekaldt."

**29.** I § 63 c verður "Erhvervs- og Selskabsstyrelsen" broytt til: "Den færøske registreringsmyndighed".

**30.** Í § 64, stk. 1 verður "Industriministeren" broytt til: "Færøernes Landsstyre" og "industriministeren" broytt til: "Færøernes Landsstyre".

**31.** Í § 64, stk. 2, verður "Erhvervs- og Selskabsstyrelsen" broytt til: "Den færøske registreringsmyndighed" og í 2. pkt. verður "Styrelsen" broytt til: "Registreringsmyndigheden".

**32.** Í § 64, stk. 3, verður "Erhvervs- og Selskabsstyrelsen" broytt til: "den færøske registreringsmyndighed".

**33.** Í § 64 a verður "industriministeren" broytt til: "Færøernes Landsstyre", "Erhvervs- og Selskabsstyrelsen" broytt til: "den færøske registreringsmyndighed" og "minister" broytt til: "Landsstyret".

**34.** Í § 64 b verður "Erhvervs- og Selskabsstyrelsen" broytt til: "den færøske registreringsmyndighed" og
"Industriministeriets Erhvervsankenævn" broytt til: "Færøernes Landsstyre".

**35.** § 66 verður orðað soleiðis:
"§ 66. Loven træder i kraft 1. januar 1994, således at den finder anvendelse for regnskabsår, der afsluttes 1. januar 1994 eller senere".

**36.** Í § 67, stk. 1, verður "1985" broytt til: "1995".

**37.** Í § 67, stk. 5, verður "Ved værdiansættelse af disse aktier og anparter finder § 101, stk. 1, i lov nr. 370 af 13. juni 1975 om aktieselskaber anvendelse" broytt til: "Disse aktier skal med angivelse af deres pålydende værdi optages som aktiver uden værdi. Er aktierne lovligt erhvervet inden for de sidste to regnskabsår, kan de dog optages i status til højst anskaffelsessummen."

**Viðmerkingar:**

Víst verður til viðmerkingarnar í viðlagda áliti um roknskaparlóg, bókføringslóg og um lóg fyri grannskoðarar.

# 159. Avtøka av løgtingslóg um eftirgeving av ella gjaldsskipan fyri skuld til landskassan

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg um eftirgeving av ella gjaldsskipan fyri skuld til landskassan.*

**§ 1.**

Løgtingslóg nr. 28 frá 30. apríl 1987 um eftirgeving av ella gjaldsskipan fyri skuld til landskassan verður avtikin.

**§ 2.**

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

*lagtingslov om ophævelse af lagtingslov om eftergivelse af eller betalingsordning for gæld til landskassen.*

**§ 1.**

Lagtingslov nr. 28 af 30. april 1987 om eftergivelse af eller betalingsordning for gæld til landskassen ophæves.

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

**Viðmerkingar:**

Viðvíkjandi løgtingslóg nr. 28 frá 30. apríl 1987 um eftirgeving av ella gjaldsskipan fyri skuld til landskassan verður víst til løgtingsmál nr. 73/1986.

Síðani er konkurslógin komin í gildi í Føroyum í 1989, herundir eisini skuldarumskipan (gældsanering).

Rættast má tí vera at avtaka 1987-lógina.

**Álit**

**í**

*løgtingsmáli nr. 159/1992: Avtøka av løgtingslóg um eftirgeving av ella gjaldskipan fyri skuld til landskassan.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. mars 1993 og eftir 1. viðgerð tann 25. mars beint í tinggjarnevndina.

Fíggjarnevndin viðgjørdi málið og mælti ein samd nevnd til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Fíggjarnevndin legði fram álit 31. mars 1993 og eftir 2. viðgerð tann 21. apríl 1993 varð málið beint aftur í fíggjarnevndina. Tá tingið var av teirri áskoðan, at lógin eisini skal galda fyri feløg og ikki bert fyri einstaklingar. Landsstýrið hevur í skrivi frá 19. apríl 1993 sent fíggjarnevndini hetta bræv.

"Viðvíkjandi løgtingsmáli nr. 159/1992 Avtøka av løgtingslóg um eftirgeving av ella gjaldsskipan fyri skuld til landskassan.

Síðani lógaruppskotið varð tilevnað, er komið fram, at ætlanir eru um at endurreisa (sanera) fiskavirkir soleiðis, at fíggjarstovnar avskriva, møguliga niðurfrysta skuld.

Um løgtingslógin nr. 28 frá 30. apríl 1987 fer úr gildi hevur landskassin onga heimild at avskriva skuld til landskassan uttan so, at virkið fer á húsagang ella verður selt á tvingsilssølu.

Landsstýrið heldur tí at løgtingslógin nr. 28 frá 30. apríl 1987 eigur at verða galdandi, meðan endurreisingin fer fram, tó við smáum broytingum.

Tá lógin nr. 28 upprunaliga bert var ætlað til einstaklingar og ikki til partafelag, er rættast at fáa greiða heimild, at lógin eisini er galdandi fyri feløg.

Tí verður skotið upp, at í lóg nr. 28 frá 30. apríl 1987 í § 1, stk. 1 og 3 verður sett aftan á skuldarin "t.e. einstaklingar ella feløg".

Fíggjarnevndin hevur á fundi tann 29. apríl 1993 viðgjørt uppskot landsstýrisins um broyting í § 1, stk. 1, og 3, í lóg nr. 28 frá 30. apríl 1987 og samsvarandi hesum setir ein samd nevnd fram soljóðandi:

**Uppskot**

**til**

**álit**

**í**

*løgtingsmáli nr. 159/1992: Avtøka av løgtingslóg um eftirgeving av ella gjaldsskipan fyri skuld til landskassan.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 18. mars 1993 og eftir 1. viðgerð tann 25. mars 1993 beint í fíggjarnevdina.

Fíggjarnevndin viðgjørdi málið og ein samd nevnd mælti løgtinginum til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum. Hetta varð gjørt í áliti nevndarinnar, sum varð framlagt 31. mars, men til 2. viðgerð, ið var 21. apríl 1993, kom eitt skriv frá landsstýrinum, har biðið varð um, at fíggjarnevndin tók málið til viðgerðar av nýggjum.

Fíggjarnevndin viðgjørdi málið av nýggjum og nýtt álit varð skrivað og greitt at leggja fyri løgtingið tann 30. apríl 1993. Hetta var tó av ongum, orsakað av, at boð nú komu frá landsstýrinum um, at landsstýrið vildi koma við uppskoti um eina nýggja lóg í staðin fyri løgtingslóg nr. 28 frá 30. apríl 1987 um eftirgeving av ella gjaldsskipan fyri skuld til landskassan.

Við løgtingsmáli nr. 195/1992: Broyting í løgtingslóg um veðhald fyri lánum til frysti- og flakavirkir, hevur landsstýrið tann 6. mai 1993 lagt nevnda uppskot fyri tingið, ið eftir áskoðan landsstýrisins, við teimum uppskotnu broytingunum, er eitt nýtililigt amboð í sambandi við ta sanering, sum er í umbúna. Við 1. viðgerð tann 11. mai varð løgtingsmál nr. 195 eisini beint í fíggjarnevndina til viðgerðar.

Fíggjarnevndin hevur nú av nýggjum viðgjørt løgtingsmál nr. 159. Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og tríggjar minnilutar Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Hergeir Nielsen og Asbjørn Joensen) vísir til uppskot landsstýrisins í løgtingsmáli nr. 195/1992: Broyting í løgtingslóg um veðhald fyri lánum til frysti- og flakavirkir og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg, Finnbogi Arge og Tordur J. Niclasen) førir fram:

Tá løgtingslóg nr. 28 frá 30. apríl 1987 um eftirgeving av ella gjaldsskipan fyri skuld til landskassan var framløgd í løgtingið, var endamálið, at landskassin kundi luttaka í saneringsætlanum saman við øðrum. Lógin umfatar stuðulslán, studningslán, kreppulán, serlán og onnur lán og krøv í sambandi við veðhaldsútlegg. Onnur dømi enn hesi eru, har landskassin er kreditor eisini óbeinleiðis eitt nú fyri lán, veitt úr grunnum undir landsstýrinum, Húsalánsgrunninum, Menningargrunninum o.s.fr.

Í løgtingsmáli nr. 81/1992: Løgtingslóg um stuðul til feskfiskaflotan, verður ásett, at stuðulslán, kreppulán og serlán kunnu leggjast um til studningslán fyri tann partin, ið ikki er fallin til gjaldingar 1. januar 1993. Eisini verður heimilað landsstýrinum, saman við løgtingsins fíggjarnevnd at yvirtaka part av láni í fiskifari, sum hevur landskassaveðhald í sama lutfalli, sum annar veðhavari ella lángevari niðurskrivar sum lán.

Henda lógin heimilar við ø.o. ikki landskassanum at verða við í eini sanering fyri skuld til landskassan, ið er fallin til gjaldingar ella, har veðhaldsskylda er vorðin effektiv hjá landskassanum.

Tá lóg nr. 28 upprunaliga bert var ætlað til einstaklingar og ikki til partafeløg, er rættast at fáa greiða heimild, at lógin eisini er galdandi fyri feløg.

Tí verður skotið upp, at lóg nr. 28 frá 30. apríl 1987 um broyting í løgtingslóg um eftirgeving av ella gjaldsskipan fyri skuld til landskassan og setir minnilutin fram:

## Uppskot

## til

Í løgtingsmáli nr. 195/1992 verður heimilað landsstýrinum at sanera lán og veðhaldsskyldur í frysti- og flakavirkjum. Henda broyting skal fyrst og fremst gerast fyri, at saneringsætlan og monopoliseringsætlan hjá fíggjargrunninum 1992 kann fremjast uttan nakra politiska viðgerð.

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirgeving av ella gjaldsskipan fyri skuld til landskassan.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 28 frá 30. apríl 1987 verður í § 1, stk. 1 og 3, sett aftan á skuldarin "t.e. einstaklingar ella feløg".

**§ 2.**

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

*lagtingslov om ændring i lagtingslov om eftergivelse af eller betalingsordning for gæld til landskassen.*

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 28 af 30. april 1987 indsættes i § 1, stk. 1 og 3, efter debitor "d.v.s. enkeltpersoner eller selskaber".

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er kundgjort.

Meirilutin í fíggjarnevndini er tó so mikið at sær komin, at hann leggur fram broytingaruppskot um, at meirilutin av fíggjarnevndini skal játta hesum.

Í lóg nr. 28 frá 30. apríl 1987 er tað landsstýrið saman við einum kvalifiseraðum meiriluta í fíggjarnevndini, sum hevur heimildina. Hetta varð gjørt út frá tí sjónarmiði, at tað ikki skuldi setast spurnartekin við, at striking av skuld til landskassan kundi fremjast sum politiskt samgongumál, heldur enn út frá einum sakligari og vinnuligari saksviðgerð, har minnilutadiktatur í samgonguni var møguligt. ( Tann 17. atkvøðan).

Tí er tað rímiligt, at kravið um kvalifiseraðan meiriluta verður uppihildið eisini í hesi lógini, og verður tí sett fram soljóðandi broytingaruppskot í løgtingsmáli nr. 195/1992: Broyting í løgtingslóg um veðhald fyri lánum til frysti- og flakavirkir.

## Broytingaruppskot

## til

## uppskot landsstýrisins

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1) | Í § 1, stk. 1, verður sett aftan á Landsstýrinum:<br>"og einum kvalifiseraðum meiriluta í fíggjarnevnd løgtingsins". | 1) | I § 1, stk. 1, indsættes efter Landsstyret:<br>"og et kvalifiseret flertal i lagtingets finansudvalg". |
| 2) | Í § 1 verður í stk. 2 sett aftan á Landsstýrinum:<br>"og einum kvalifiseraðum meiriluta í fíggjarnevndini." | 2) | I § 1, stk. 2, indsættes efter Landsstyret:<br>"og et kvalifiseret flertal i lagtingets finansudvalg." |

Um lóg nr. 28 verður sett úr gildi, hevur landsstýrið onga heimild at gera akkordskipan fyri tær meira enn 1 milliard kr., sum longu eru vorðnar effektivar hjá landskassanum, men ikki avskrivaðar. Heldur ikki verður møguligt hjá eitt nú Húsalánsgrunninum, Menningargrunninum o.s.fr. at gera gjaldsavtalu og skipan, har partar av skuldini verða avskrivaðir.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg) heitir tí á løgtingið um at lata verða við at atkvøða fyri avtøku av lóg nr. 28 frá 30. apríl 1987.

# 160. Dómarakanning av politisku og umsitingarligu ábyrgdini síðani 1975

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Føroya løgting áleggur landsstýrinum at seta dómarakanning í verk til tess at staðfesta, um politiskt og umsitingarligt ábyrgdarloysi er farið fram í Føroyum síðani 1975.

**Viðmerkingar:**

Eftir lokið verk av trotabúgvum á Skála Skipasmiðju komu avtøkustjóramir við niðanfyristandandi tilmæli til Føroya landsstýri:

*"Aftan á at hava gjøgnumgingið málið, vísandi til omanfyristandandi, meta vit, at fleiri viðurskifti eru í hesum byggimáli, sum eftir okkara tykki eru óvanlig, og antin má talan vera um viðurskifti, sum kunnu hava revsing við sær, ella er talan um politiskt og umsitingarligt ábyrgdarloysi, og verður tí mælt til, at landsstýrið umhugsar at leggja málið fyri politivaldið til kanningar."*

Føroya landsstýri koyrdi málið til fútan, sum reisti ákæru móti fyrrv. stjóranum á Skála Skipasmiðju og byggiharranum á m/s "Heygadrangi" og ráðgevarum hansara.

Nú Føroya rættur púra hevur frikent teir ákærdu, og havandi í huga, at Jalgrim Hilduberg, skrivstovustjóri í Tinganesi, sum ein av avtøkustjórunum á Skála skipasmiðju, sigur, at so er talan um politiskt og umsitingarligt ábyrgdarloysi, tá er skylda háttvirda Føroya løgtings at krevja dómarakanning av tí útinnandi valdinum, sum tað hevur valt og hevur ábyrgdina av.

Meðan Christiansborg er á gosi um óskilið í føroyska almannaverkinum, er tað í tøkum tíma, at dómarakanningin fer av bakkastokki - og má hon fevna um umsitingina í Tinganesi saman við øllum stovnunum undir landinum.

Fyri at bjarga tí, sum kanska er eftir av virðingini fyri politiska lívinum í Føroyum, er tað umráðandi, at vit sjálvir biðja um dómarakanningina.

Ella kann væntast, at fólkatingið soleiðis, sum leikur er farin fram, síðani vit vórðu settir undir umsiting 6. oktober 1992, áleggur stjórn sínari at seta kanningina í verk.

Eitt slíkt orðaskifti í danska fólkatinginum kemur illa við fyri føroyska heimastýrið, sum kann verða rent um koll.

Tí í oktober og februar hava vit fingið settar treytir av Christiansborg, sum í danska fólkatinginum seta stór spurnartekin við gongdina undir heimastýrinum seinastu umleið 18 árini.

Táverandi løgtingslimur Poul Petersen, ið var við á øllum fundum við danir frá 1946 til 1948, sum endaðu við galdandi heimastýrislóg, er ikki í iva, tá ið hann sigur, at galdandi lóg er ikki annað enn víðkaðar heimildir í mun til amtsstøðuna.

Hann var einasti løgfrøðingur í føroysku samráðingarnevndini og er krúnvitni okkara í lógararbeiðinum.

Løgfrøðilig stórmenni sum Alf Ross, Poul Andersen og Poul Meyer geva honum rætt.

Max Sørensen, Frederik Harhoff og Henrik Zahle hava eina aðra áskoðan.

Tað verður sera óheppið í hesum lagnudøgum hjá føroysku tjóðini, um allir hesir spurningar vera endavendir í danska fólkatinginum.

Vónandi er Føroyta Løgting so mikið at sær komið, at tað tekur í egnan barm, so at vit føroyingar taka fulla ábyrgd av tí, sum er farið fram politiskt og umsitingarliga seinastu 18 árini.

Tástani kunnu vit aftur við sjálvsvirðingini í hásætinum vera í samráðingum við danir og øðrum, um teir ovurhonds stóru trupulleikar, land okkara verður í, í komandi áruin.

## Álit

### í

*løgtingsmáli nr. 160/1992: Dómarakanning av politisku og umsitingarligu ábyrgdini síðani 1975.*

Málið er lagt fram av Kristiliga fólkaflokkinum Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 18. mars 1993 og eftir 1. viðgerð 1. apríl 1993 beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Mikkjal Sørensen, Birgir Danielsen og Lisbeth L. Petersen) tekur ikki undir við málinum, tá sakarmálið um "Heygadrang", sum fyriliggjandi uppskot til samtyktar er bygt á, er kært til landsrættin, ið fer at viðgera málið einaferð í september 1993.

Ein minniluti (Hergeir Nielsen) tekur støðu í tingsalinum.

Ein annar minniluti (Helena Dam á Neystabø) tekur støðu í tingsalinum.

# 161. Løgtingslóg um fiskavraking

**Uppskot**

**til**

*Løgtingslóg um fiskavraking.*

**§ 1.**

Allur saltfiskur, ið verður fluttur úr Føroyum, skal, sama til hvat land ella hvønn annan stað í ríkinum, hann verður fluttur, verða mettur og flokkaður av vrakarum undir umsjón yvirvrakara ella vrakieftirlitsmanni. Somuleiðis skal fiskurin verða vigaður á vektum, sum uppfylla tær treytir, ið landsstýrið harum fyriskipar.

**2. stk.** Yvirvrakari og vrakieftirlitsmenn skulu í báðum teimum førum, sum nevnd eru í 1. stk., hava umsjón við, hvussu fiskurin er innskipaður, løddur og viðfarin í útflutningskipinum. Fyriskipanir teirra hesum viðvíkjandi eru allir viðkomandi skyldugir at lýða. Hvørjum fiskafarmi skal fylgja váttan yvirvrakara ella vrakieftirlitsmanna, skrivað á farmaprógvi.

**3. stk.** Allur fiskur skal verða væl saltaður og umrivin seinast 8 dagar aftaná, at hann er veiddur: Fiskur, sum er skipaður upp í Føroyum sum saltfiskur, skal, tá ið hann verður uppskipaður - ífall manning ella reiðari ynskir tað undir vrakieftirliti - verða vigaður á tann hátt, sum nevndur er í 1. stk. Tó er landsstýrinum heimilað at gera av, at váttan frá vrakara, sum var hjástaddur, tá ið fiskurin varð skipaður upp á land, og sum inniheldur álit vrakarans á góð-

*Lagtingslov om fiskevragning.*

**§ 1.**

Al saltfisk, som udføres fra Færøerne, skal uanset til hvilket land eller hvilke dele af det øvrige kongerige, udførslen sker, af vragere under overvragerens eller en vragerkontrollørs opsyn vurderes og klassificeres, ligesom den skal opvejes på vægte, der opfylder de krav, der stilles i de derom af landsstyret givne forskrifter.

**Stk. 2.** Overvrageren og vragerkontrollørerne skal i de i stk. 1 nævnte tilfælde føre tilsyn med fiskens indskibning, stuvning og behandling i fragtskibene. Deres krav i så henseende er alle vedkommende pligtige at adlyde. Med hver fiskeladning skal følge overvragerens eller vragerkontrollørens attest, der påtegnes konossementerne.

**Stk. 3.** Al fisk skal være velsaltet og omlagt senest 8 dage efter, at den er dræbt. Fisk, som ilandbringes på Færøerne som saltfisk, skal ved ilandbringelsen - ifald mandskab eller reder ønsker det under vragerkontrol opvejes på samme måde som i stk. 1 ommeldt. Landsstyret kan dog bestemme, at en af den ved ilandbringelsen tilstedeværende vragers udstedte attest, indeholdende vragerens bedømmelse af den pågældende fiskeladnings kvalitet, salt-

sku, salting og ætlaðari vekt av fiskafarminum, tá ið hann varð uppskipaður, og í hagreiðing fisksins frammanundan gongur í staðin fyri meting, flokkan og vigan. Er nú fiskurin ikki fullsaltaður (umrivin), tá ið hann verður uppskipaður, gevur vrakarin váttan um hetta, eins og hann í váttanini ásetir, nær ið meting, flokkan og vigan skal vera. Landsstýrið kann gera av, at váttanin, sum nevnd er í 2. punktum, gongur í staðin fyri meting flokkan og vigan. Framvegis skal allur saltfiskur, sum ikki hevur verið vrakaður áður, verða vrakaður, fyrstu ferð hann verður seldur í Føroyum. Eisini um hesa vraking kann vrakari geva váttan.

**4. stk.** Tær váttanir, sum gjørdar eru um meting, flokkan og vigan, hava í rættarviðurskiftum alment sannleikagildi. Tó er ikki lokað fyri mótprógvi.

**5. stk.** Loyvt er vrakieftirlitsmanni, tá ið hann fær samtykki frá yvirvrakara, at veita vrakara fullmátt til at starvast í staðin fyri seg sum vrakieftirlitsmaður. Um hetta verður gjøllari fyriskipað í starvsreglugerðini, ið umrødd er í 6. stk.

**6. stk.** Gjøllari reglur um vrakingina og vøruviðgerðina, bæði meðan inn verður skipað og umborð í farmaskiunum, verða settar í starvsreglugerð fyri vrakieftirlitsmenn, sum landsstýrið gevur út.

## § 2.

Landsstýrið skipar yvirvrakara, sum hevur í hendi umsjón við allari fiska-

ningsgrad og antagelige vægt ved ilandbringelsen og hvilken foregående behandling, fisken har været underkastet, kan træde i stedet for vurdering, klassificering og opvejning. Forsåvidt fisken ved ilandbringelsen ikke måtte være fuldsaltet (omlagt), afgiver vrageren attest herom, ligesom han i attesten fastsætter det tidspunkt, hvor vurdering, klassificering og opvejning skal finde sted. Landsstyret kan bestemme, at den i 2. punktum nævnte attest træder i stedet for vurdering, klassificering og opvejning. Endvidere skal der finde vragning sted af al ikke tidligere vraget saltfisk, første gang den sælges på Færøerne. Også om denne vragning kan vragere udstede attest.

**Stk. 4.** De om den stedfundne vurdering, klassificering og opvejning udfærdigede attester har i retlige forhold offentlig troværdighed. Modbevis er dog ikke udelukket.

**Stk. 5.** En vragerkontrollør kan med overvragerens samtykke meddele en vrager fuldmagt til at udføre hvervet som vragerkontrollør i sit sted. Der træffes herom nærmere bestemmelser i det i stk. 6 nævnte arbejdsregulativ.

**Stk. 6.** Nærmere regler om vragningen og varens behandling både ved indskibningen og i fragtskibene fastsættes i et af landsstyret udstedt arbejdsregulativ for vragerkontrollører og vragere.

## § 2.

Overvragere, der udnævnes af landsstyret, fører tilsyn med al vragning af

vraking í Føroyum. Yvirvrakarin røkir saman við einum vrakieftirlitsmanni í § 3, stk. 1, nevndu økjum:

I Norðoyggjar,
II Eysturoy,
III Suðuroy og
IV Streymoy, Vágoy og Sandoy.

Eisini er hann ráðgevari hjá tí almenna í málum viðvíkjandi fiskavraking og -virking. Løn hansara verður ásett í tænastumannalógini.

§ 3.

Landsstýrið skipar vrakieftirlitsmenn við tænastustaði í 4 økjum:

I Norðoyggjar,
II Eysturoy,
III Suðuroy og
IV Streymoy, Vágoy og Sandoy.

Løn teirra verður ásett í tænastumannalógini.

**2. stk.** Tað ber til at broyta talið á vrakieftirlitsmonnum við veiting á fíggjarlógini.

**3. stk.** Vrakieftirlitsmenn skulu greiða úr hondum tey størv, ið tilskilað eru í §§ 1 og 7.

**4. stk.** Vrakieftirlitsmenn skulu, áðrenn teir verða skipaðir í starvið, hava fingið neyðturviligan kunnleika um fiskavraking og um, hvussu fiskurin eigur at verða virkaður og hagreiddur, annaðhvørt við tí at hava starvað sum fiskavrakari ella á annan hátt.

**5. stk.** Teir skulu, áðrenn teir taka við starvi, undirskriva trygdarorð, sum landsstýrið fyriskipar, um at teir vilja

fisk på Færøerne. Overvrageren passer sammen med en vragerkontrollør de i § 3, stk. 1, nævnte distrikter:

I Norðoyggjar,
II Eysturoy,
III Suðuroy og
IV Streymoy, Vágoy og Sandoy.

Han er tillige det offentliges konsulent i sager angående vragning og tilvirkning af fisk. Hans lønning fastsættes ved tjenestemandsloven.

§ 3.

Vragerkontrollører udnævnes af landsstyret med tjenestested i områder:

I Norðoyggjar,
II Eysturoy,
III Suðuroy og
IV Streymoy, Vágoy og Sandoy.

Deres lønning fastsættes i tjenestemandsloven.

**Stk. 2.** Antallet af vragerkontrollører kan ændres ved bevilling på finansloven.

**Stk. 3.** Der påhviler vragerkontrollørerne de i §§ 1 og 7 ommeldte opgaver.

**Stk. 4.** Vragerkontrollørerne skal forinden deres beskikkelse have erhvervet sig den fornødne kendskab om vragnig af fisken og fiskens tilvirkning og behandling, enten ved beskæftigelse som vrager eller på anden måde.

**Stk. 5.** De skal, forinden de begynder deres virksomhed, underskrive en højtidelig forsikring i en af landsstyret

fylgja teimum reglum, ið settar verða viðvíkjandi starvið teirra, og ídnir og nærlagdir røkja tær skyldur, sum á teimum hvíla í støðu teirra.

§ 4.

Útreiðslur landskassans til lønir yvirvrakara og vrakieftirlitsmanna, dagpeningur teirra og ferðakostnaður verða sum part goldnar við tað, at í teimum í § 1, 1. og 2. stk., nevndu førum skal hann, sum vrakað er fyri, lata í avgjaldi 5 oyru av hvørjum 100 kg av saltfiski.

**2. stk.** Tá ið serliga ber til, hevur landsstýrið heimild til fyribils at lækka hetta avgjaldið ella sleppa tí.

**3. stk.** Landsstýrið setir reglurnar um, hvussu avgjaldið skal rindast.

§ 5.

Løn yvir- og eftirlitsvrakara fyri arbeiði teirra við vraking verður hann at gjalda, ið vrakað er fyri eftir reglum, sum landsstýrið setir í starvsreglugerð vrakaranna.

**2. stk.** Gerst tað neyðugt, verða hesar útreiðslur latnar úr landskassanum frammanundan.

**3. stk.** Í hesum reglugerðum skal vera heimilað at gera av, annaðhvørt hvør útflytari sær skal greiða hesi avgjøld, ella um tey skulu verða líknað á allar útflytarar.

**4. stk.** Verður ósemja teirra millum, sum eiga lut í máli av rokningum vrakaranna eftir hesi lóg, sker sýslumaðurin úr, og er avgerð hansara bindandi.

fastsat form om, at de vil rette sig efter de bestemmelser, der træffes angående deres virksomhed, og at de med flid og nidkærhed vil opfylde de pligter, der påhviler dem i deres bestilling.

§ 4.

Til delvis dækning af landskassens udgifter til overvragerens og vragerkontrollørernes lønninger, dagpenge og rejseudgifter vil der i de i § 1, stk. 1 og 2, ommeldte tilfælde af rekvirenten være at erlægge en afgift af 5 øre pr. 100 kg saltfisk.

**Stk. 2.** Denne afgift kan landsstyret under særlige omstændigheder midlertidig nedsætte eller eventuelt frafalde.

**Stk. 3.** De nævnte forskrifter om afgiftens betaling fastsættes af landsstyret.

§ 5.

Overvragerens og vragernes løn for deres arbejde med vragningen betales af rekvirenten efter regler, der nærmere fastsættes i vragernes arbejdsregulativ.

**Stk. 2.** Om fornødent udredes de pågældende omkostninger, forskudsvis af landskassen.

**Stk. 3.** I disse regulativer skal kunne træffes bestemmelse om, hvorvidt hver enkelt eksportør for sit vedkommende skal bære disse afgifter, eller hvorvidt der skal finde en fordeling sted af disse på samtlige eksportører.

**Stk. 4.** I tilfælde af uenighed mellem de pågældende angående vragernes regninger ifølge nærværende lov, skal sysselmanden kunne decidere med bindende virkning.

§ 6.

Umframt starv sítt við at vraka klippfisk til útflutnings og saltfisk skulu vrakieftirlitsmenn verða skyldugir at ferðast um í umdømum sínum til tess at leiðbeina fiskahagreiðingini, og skal yvirvrakarin skipa fyri umferðum teirra. Í starvsreglugerðunum verður avgjørt, hvussu kostnaðurin verður at greiða.

**2. stk.** Vrakieftirlitsmenn skulu haraftrat, um tað er kravt, og tað ikki bagir starvi teirra, annars verða skyldugir at hjálpa til at døma um fisk eisini í øðrum førum enn nevnd eru í § 1, 4. stk.; tá skal hann, sum hevur biðið hesa hjálp, gjalda vrakarunum løn teirra, dagpening og ferðakostnað eftir teimum reglum, sum um hetta eru settar.

§ 6.

Foruden deres virksomhed ved vragning af klipfisk til eksport og saltfisk skal vragerkontrollørerne være pligtige til efter en af overvrageren fastsat turnus at rejse om i deres distrikter for at vejlede folk med hensyn til behandlingen af fisk og føre tilsyn med den. I regulativerne vil der være at træffe bestemmelse om, hvorledes omkostningerne skal afholdes.

**Stk. 2.** Endvidere skal vragerkontrollørerne og vragerne være pligtige til, om det forlanges, og det kan forenes med deres øvrige virksomhed, at yde deres medvirken ved bedømmelsen af fisk udover de i § 1, stk. 4, nævnte tilfælde; i så fald betales vragernes lønninger, dagpenge og rejseudgifter af den, der har forlangt deres medvirken, med den i henhold til de herom gældende regler fastsatte betaling.

§ 7.

Brot móti reglunum í hesari lóg verða revsað við sektum, ið leggjast til landskassan.

**2. stk.** Sakarmál av hesum brotum verða at viðgera sum løgreglumál.

§ 7.

Overtrædelse af de i denne lov indeholdte bestemmelser straffes med bøder, der tilfalder landskassen.

**Stk. 2.** Sager i anledning af disse overtrædelser behandles som politisager.

§ 8.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 8.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

**Viðmerkingar:**

Við løgtingslóg nr. 12 frá 12. januar 1950 vórðu ávísar reglur um fiskavraking settar í gildi í Føroyum.

Hesar reglur vóru galdandi í nærum 41 ár. Í 1990 varð onnur løgtingslóg samtykt, sum við gildi frá 1. januar 1991 setti lógina um fiskavraking frá 1950 úr gildi.

Sambært løgtingslógini frá 1950 um fiskavraking varð ein almennur vrakarastovnur skipaður, sum var undir leiðslu av einum yvirvrakara. Landið varð skipað í átta vrakaradømir. Í hvørjum vrakaradømi stóð ein vrakieftirlitsmaður fyri tí dagliga arbeiðinum hjá stovninum. Yvirvrakarin og vrakieftirlitsmenninir vórðu løntir av tí almenna.

Til tað dagliga arbeiðið í samband við fiskalandingar og pakking av fiski til útflutnings høvdu vrakieftirlitsmenninir sonevndar fiskavrakarar. Hesir, ið vórðu løntir av virkjunum, fingu vanliga tímaløn + 80%. Hjá virkjunum var stór ónøgd við hesa eykasamsýning. Tað var helst meginorsøkin til, at lógin um fiskavraking varð sett úr gildi frá 1. januar 1991.

Orsøkin til eykasamsýningina var m.a. tann, at vrakarin í sínum arbeiði, kundi koma í ta støðu, at hann gekk virkisleiðsluni ov nær, og tí kundi kouna at vera fyri vanbýti, tá talan var um annað arbeiði enn fiskavraking, í tíðarskeiðum, tá einki vrakaraarbeiði var. Tann serliga ábyrgdin, sum varð løgd á ein fiskavrakara, taldi sjálvandi eisini við, tá eykasamsýningin varð áskett.

Øll tey árini, sum vrakarastovnurin virkaði, hevði føroyskur fiskur - serstakliga saltfiskurin - avbera gott orð á sær hjá okkara keyparum og millum brúkarar í keyparalondunum. Hetta komst sjálvandi av, at so leingi vrakarastovnurin virkaði, høvdu vit eina einsháttaða flokking í støddir og eina einsháttaða vraking í góðskustig (nr. 1, 2 3 og vrak). Undir hesi skipan bar til at tosa um "Føroya fisk" undir einum, og keyparin var altíð vísur í, hvat tað var, hann keypti.

Síðani vrakarastovnurin helt uppat at virka, hevur tilvildin valdað, bæði viðvíkjandi flokking í støddir og viðvíkjandi vraking í tey ymisku góðskustigini. Síðani tá hevur hvørt virkið sær, sett treytirnar um flokking í støddir, og um vraking í góðskustig. Úrslitið er, at hin áður so væl kendi og væl umtókti "Føroya fiskurin" ikki er at finna á marknaðinum longur. Í dag kann keyparin ikki vera vísur í, at hann fær ta vøruna, sum hann hevur ynskt og heldur seg hava keypt.

Uppskotsstillararnir eru vitandi um, at tað hevur verið sera trupult hjá føroyingum at selja saltfisk tey seinastu gott og væl tvey árini, at miðalprísurin er komin heilt niður á umleið 20 kr. fyri kilo, og at talið av "reklamatiónum" er nógv vaksið hesi árini og hevur verið munandi størri enn árini frammanundan. Orsøkin til hetta er sjálvandi tann, at vit ikki longur hava eina einsháttaða flokking í støddum og eina einsháttaða vraking í góðskustig.

Samstundis eru vit vitandi um, at keyparar heldur enn fegnir vilja keypa føroyskan saltfisk og geva munandi hægri prís enn tann, sum er og hevur verið galdandi seinastu tvey árini, men hetta er treytað av, at fiskurin verður flokkaður og vrakaður eftir teimum reglum, ið vóru galdandi áðrenn 1. januar 1991. Keypararnir ynskja, at vøran, ið teir keypa, hevur eitt blátt stempul frá einum alment góðkendum stovni.

Tann vánaliga støðan, sum vit føroyingar eru í á saltfiskamarknaðinum, hevur m.a. ført við sær, at langfaratrolararnir hava fingið boð um, at teir skulu leggja seg eftir at veiða fisk, ið er egnaður til flakaframleiðslu. Hetta hevur aftur ført við sær, at trolararnir hava siglt undan fiski, tá talan hevur verið um stóran tosk, sum einans kann nýtast til saltfiskaframleiðsu. Hetta er stórt spell. Serliga tá nú prísurin á frystum flaki eisini er fallin heilt munandi.

Í hjálagda lógaruppskoti verður mælt til at endurskipa vrakarastovnin við serligum atliti at saltfiskaframleiðslu og saltfiskaútflutningi. Skotið verður upp, at seta ein yvirvrakara at skipa Føroyar í fýra vrakaradømi og at seta fýra vrakieftirlitsmenn. Ein fyri hvørt av teimum fýra vrakaradømunum. Eftir uppskotinum verða vrakaradømini hesi: 1) Norðoyggjar, 2) Eysturoy, 3) Suðuroy og 4) Streymoy, Sandoy og Vágar. Gingið verður út frá, at yvirvrakarin heldur til í tí 4. vrakaradøminum og soleiðis kann verða vrakieftirlitsmanninum har til hjálpar.

Yvirvrakarin, sum var, er sagdur úr starvi. Tað sama er hent við tveimum vrakieftirlitsmonnum. Hesir eru allir tænastumenn og hava harvið rætt til løn í trý ár. Á galdandi fíggjarlóg eru 2.150.000 kr. settar av til góðskueftirlit. Sostatt kann ein endurskipaður vrakarastovnur rekast uttan nakra eykajáttan í 1993.

## Álit

### í

*løgtingsmáli nr. 161/1992: Løgtingsmál um fiskavraking.*

Málið er lagt fram av løgtingsmonnunum Vilhelm Johannesen , Heini O. Heinesen, Anfinn Kallsberg, Jógvan I. Olsen, Henrik Old og Asbjørn Joensen tann 23. mars 1993 og eftir 1. viðgerð 30. mars beint í fiskimálanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið. Í lógaruppskotinum verður mælt til at endurskipa vrakarastovnin við serligum atliti at saltfiskaframleiðslu og saltfiskaútflutning. Nevndin er samd um, at málið eigur at fáa eina gjølliga viðgerð og mælir tí til, at málið fær víðari viðgerð í fiskimálanevndini sum millumtinganevnd og setir tí fram soljóðandi:

### Uppskot

### til

### samtyktar

Løgtingið samtykkir, at álagt verður fiskimálanevndini at arbeiða víðari við løgtingsmáli nr. 161/1992: Løgtingslóg um fiskavraking sum millumtinganevnd og at leggja fram álit í ólavsøkutingsetuni 1993.

# 162. Løgtingslóg um landsins almenna roknskaparhald v.m.

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um landsins almenna roknskaparhald. v.m.*

**§ 1.**

Landsstýrið leggur, innan juni mánaði er liðin, fyri løgtingið tann samlaða landsroknskapin fyri undanfarna fíggjarár.

**Stk. 2.** Landsroknskapurin skal í uppsetingini fylgja fíggjar- og eykajáttanarlógum fyri árið, talan er um, og skal fevna um allar inntøkur og útreiðslur landsins fyri farna fíggjarár, aktiv og passiv landsins og broytingunum hesum viðvíkjandi í árinum.

**§ 2.**

Reglurnar um roknskaparhald landsins fevna um alla landsumsitingina. allar landsstovnar og stovnar v.m. hvørs rakstrarætlan er tikin við á játtanarlóg.

**2. stk.** Landsstýrið kann gera av, at lógarinnar reglur um roknskaparhald og reglur, sum verða gjørdar sambært lógini, skulu galda fyri stovnar, feløg, grunnar v.m.:

1) hvørs útreiðslur ella roknskaparliga hall verða godin við landsstudningi ella við gjøldum, avgjøldum ella aðrar inntøku sambært lóg, ella

*lagtingslov om landets regnskabsvæsen m.v.*

**§ 1.**

Landsstyret framlægger inden udgangen af juni måned for lagtinget det samlede landsregnskab for det foregående finansår.

**Stk. 2.** Landsregnskabet skal i sin opstilling følge det pågældende års finans- og tillægsbevillingslove og skal omfatte samtlige landets indtægter og udgifter for det forløbne finansår, landets aktiver og passiver og bevægelserne heri i årets løb.

**§ 2.**

Reglerne om landets regnskabsvæsen omfatter hele landsadministrationen, samtlige landsinstitutioner og institutioner m.v., hvis driftsbudget er optaget på bevillingslov.

**Stk. 2.** Landsstyret kan bestemme, at lovens regler om regnskabsvæsen og regler, der udstedes efter loven herom, skal finde anvendelse for institiutioner, foreninger, fonde m.v.

1) hvis udgifter eller regnskabsmæssige underskud dækkes ved landstilskud eller ved bidrag, afgift, eller anden indtægt i henhold til lov, eller

2) sum fáa kapitalinnskot, studning, lán, veðhald, o.t. ella annan stuðul frá landinum ella frá einum stovni v.m., sum kemur undir nr. 1, um so er, at kapitalinnskotið v.m. hevur munandi týdning fyri móttakaran.

**3. stk.** Stk. 2 verður tó ikki nýtt í tann mun, tað í aðrari lóggávu eru reglur um roknskaparhald, sum ikki eru í tráð við lógina ella reglur, ásettar sambært lógini.

§ 3.

Landsstýrið ásetir reglur um roknskaparhald landsins. Í hesum sambandi kann landsstýrið umframt at áseta krøv um trygd og skipað viðurskifti innan roknskaparøkið, áseta krøv um útvegan av upplýsingum til nýtslu í sambandi við búskaparliga ráðlegging, stýring og eftirlit.

§ 4.

Landsumsitingin og teir landsstovnar v.m., sum koma undir § 2, stk. 1, fráboða landsstýrinum tær upplýsingar og útvega tað roknskaparliga tilfar, sum landsstýrið metir neyðugt fyri at leggja fram landsroknskapin.

§ 5.

Landsumsitingin og teir landsstovnar v.m., sum koma undir § 2, stk. 1, skulu gera eina reglugerð um roknskaparhaldið í landsumsitingini ella á stovninum.

**2. stk.** Henda reglugerð skal gerast samsvarandi reglum, sum verða ásettar av landsstýrinum.

2) som modtager kapitalindskud, tilskud, lån, garanti o.l. eller anden støtte fra landet eller en institution m.v., som er omfattet af nr. 1, såfremt kapitalindskuddet m.v. har væsentlig betydning for modtagerne

**Stk. 3.** Stk. 2 finder dog ikke anvendelse i det omfang, der i anden lovgivning er regler om regnskabsvæsen, som ikke er forenelige med loven eller regler, fastsat efter loven.

§ 3.

Landsstyret fastsætter regler om landets regnskabsvæsen. I denne forbindelse kan landsstyret ud over at stille krav om sikkerhed og orden inden for regnskabsområdet, stille krav om tilvejebringelse af oplysninger til brug for økonomisk planlægning, styring og kontrol.

§ 4.

Landsadministrationen og de landsinstitutioner m.v., der er omfattet af § 2, stk. 1, meddeler landsstyret de oplysninger og tilvejebringer det regnskabsmæssige materiale, som landsstyret finder nødvendigt for at aflægge landsregnskabet.

§ 5.

Landsadministrationen og de landinstitutioner m.v., der er omfattet af § 2, stk. 1, skal udarbejde en instruks om regnskabsvæsenet i landsadministrationen eller institutionen.

**Stk. 2.** Denne instruks skal udarbejdes i overensstemmelse med retningslinjer, der fastsættes af landsstyret.

| § 6. | § 6. |
| --- | --- |
| Henda lóg kemur í gildi tann 1. januar 1994. | Denne lov træder i kraft den 1. januar 1994. |

**Viðmerkingar til lógaruppskotið:**

**Almennar viðmerkingar:**

Samanborið við grannalond okkara Danmark og Grønland, hava vit í Føroyum onga lóg um landsroknskap og um almenna landsroknskaparhaldið v.m. Kortini hava viðurskiftini ikki verið heilt óskipað upp gjøgnum tíðina.

Í løgtingslóg nr. 83 frá 15. mars 1939 om Færøernes Oppebørselskontor, var ásett, at sctast skuldi á stovn gjaldstova, sum skuldi taka við allari roknskaparførslu fyri teir kassar, sum tá vóru stýrdir av fútanum og løgtingsskrivstovuni viðvíkjandi ríkiskassanum. Harnæst kundi ríkismálaráðið áseta í hvørjum einstøkum føri eftir ummæli frá løgtinginum, at aðrir grunnar og stovnar undir almennum stýri skuldu verða lagdir til gjaldstovuna.

Lógin um Føroya Gjaldstovu varð nakað broytt í sambandi við, at heimastýrið yvirtók gjaldstovuna í 1949. Hetta var sambært lóg nr. 84 frá 1. apríl 1949. Í lógini verður nevnt, at øll roknskaparførsla viðvíkjandi stovnum, grunnum o.t. undir almennum stýri ella eftirliti verður løgd undir gjaldstovuna.

Almenna umsitingin og tað almenna virksemið var tá bert ein lítil partur av tí, sum tað er í dag. Almenna Roknskaparhaldið var við fáum undantøkum tað sama sum gjaldstovan.

Hóast gjaldstovan gjørdist føroyskur stovnur burturav, tá hon varð yvirtikin 1. apríl 1949, var hon kortini framvegin kassi og roknskaparhaldari hjá ríkisstýrinum. Í sambandi við umsitingina av hesum arbeiði vóru nýttar danskar reglugerðir, roknskaparinstruksir o.a. Tey strongu krøvini, ið danir stillaðu til teirra roknskaparhald, gjørdu, at tað varð uppbygd ein roknskaparsiðvenja, sum eisini kom at galda fyri tað føroyska roknskaparhaldið. Eftir hondini sum føroyska heimastýrið yvirtók fleiri og fleiri málsøkir, helt arbeiði við ríkisroknskaparhaldinum uppat á gjaldstovuni, og í 1981/82 var seinasta árið, at ríkiskassin lat til raksturin hjá gjaldstovuni.

Í sjeyti- og áttatiárunum fóru stórar rembingar fram innan ta føroysku umsitingina. Fleiri málsøki vórðu yvirtikin og fleiri almennar tænastur vórðu stovnsettar. Sum liður í hesum broytingum varð bygnaðurin innan ta almennu umsitingina broyttur og víðkaður, roknskaparhaldið varð umlagt til EDV og umskipanir fóru fram innan almenna roknskaparhaldið við atliti til teir nýggju stovnarnar. Hesar stóru broytingarnar viðvíkjandi almenna roknakparhaldinum, fóru fram uttan at ásettar vórðu grundleggjandi meginreglur um, hvussu bygnaðurin við atliti til almenna roknskaparhaldið sum heild skuldi fyriskipast, hvussu dátastreymar,

ábyrgd og heimildir skuldu formaliserast, hvussu leiklutur gjaldstovu-nar skuldi vera í tí mentu umsitingini og hvussu EDV-skipanir skuldu mennast og samskipast. Sum úrslit av hesum kunnu nevnast trupulleikar sum:

* Vantandi felags kontoskipan.
* Desentralar roknskaparskipanir/lønarskipanir uttan allýst tilknýti mótvegis gjaldstovuni/landsroknskapinum.
* Spjaðing av almennum gjaldføri.
* Ymisk fíggjarlógarviðgerð fyri almennar stovnar. T.d. skulu nakrir flýggja yvirskotið til landskassan, meðan aðrir uttan ásetingar kunnu gera nýtslu av yvirskotinum.
* Ógreið uppsetan av landsroknskapinum.
* Ógreiðleikar um, hvørjir stovnar/grunnar skulu við á landsroknskapin og á fíggjalógina.
* Ógreiðleikar viðvíkjandi heimildum og ávísingum viðvíkjandi útgjalding úr landskassanum.

Í 1988 setti landsstýrið eina nevnd at viðgera hesar trupulleikar og úrslitið var reglugerð frá landsstýrinum um útgjald úr landskassanum, dagfest 12. januar 1990.

Á heysti 1992 metti landsstýrið, at rættast var at halda áfram við hesum arbeiði og setti ein nýggjan arbeiðsbólk at gera uppskot til lóg um landsins almenna roknskaparhald. Landsstýrið heldur, at tað helst verður neyðugt við einari nýggjari fíggjarstýringsskipan á gjaldstovuni, men metir, at tað er neyðugt at lýsa og greiða tey formligu viðurskiftini, áðrenn ein fíggjarstýringarskipan kann virka sum ætlað.

Eisini skal verða víst á álit um "Kanning av informatiktørvinum hjá tí almenna, frá desember 1992", har ein av niðurstøðunum eisini er, at tað er tørvur á formligum roknskaparreglum og at fáa greiðu á EDV - viðurskiftunum á hesum økinum.

Arbeiðsbólkurin hevur í álitinum lagt serligan dent á at lýsa tey núverandi viðurskiftini viðvíkjandi landsins almenna roknskaparhaldi v.m. Bólkurin kann staðfesta, at frá fleiri síðum verður víst á ymsar trupulleikar, spurningar og viðurskifti, sum røkka frá, hvussu landsins almenna roknskaparhald v.m. skal skipast og hvussu almennir roknskapir skulu setast upp.

Bólkurin heldur tað tí vera neyðugt, at landsstýrið fyrst við lóg útvegar sær heimildir til tess at áseta reglur og krøv fyri skipan av roknskaparhaldi innan tað almenna og um uppsetan av almennum roknskapum, ásetan av ymsum fyrisitingarreglum á ávísum økjum v.m.

Lógaruppskotið er samsvarandi donsku lógini "Lov om statens regnskabsvæsen m.v."

Lógaruppskotið fevnir bert um meginreglurnar fyri landsins almenna roknskaparhald.

**Viðmerkingar til tær einstøku greinarnar í lógaruppskotinum:**

**Til § 1**

Eitt av høvuðsendamálunum við landroknskapinum er at skráseta inntøkur og útreiðslur, sum løgtingið hevur heimilað á fíggjarlógini ella aðrari játtanarlóg. Tí er umráðandi, at allar heimildir verða skrásettar í roknskapinum og at roknskapurin í uppsetingini av inntøkum og útreiðslum fylgir fíggjar- og eykajáttanarlógum. Landsroknskapurin er sostatt grundarlagið undir løgtingsins eftirliti við, hvussu landumsitingin v.m. húsast við játtanunum. Hetta eftirlit snýr seg m.a. um, at eingin útreiðsla ella inntøka er hildin uttan heimild er fyri hesum.

Sambært § 12 í uppskoti til grannskoðan av almennum roknskapum verður landsstýrinum álagt at lata landsgrannskoðanini landsroknskapin við frágreiðing um frávik millum játtanar- og roknskapartøl innan 6 mánaðir aftaná, at fíggjarárið er liðið. Eftirlit við játtanum løgtingsins vegna er álagt løgtingsgrannskoðaranum, og sum grundarlag fyri hesum arbeiði er sambært § 18, stk. 1, í uppskoti til løgtingslóg um grannskoðan av landsins almennu roknskapum álagt landsgrannskoðanini at lata løgtingsgrannskoðarunum eina serliga frágreiðing hesum viðvíkjandi.

Til § 2

Sum nevnt í teimum almennu viðmerkingunum er eingin føst skipan, ið ásetir, hvussu ymiskir landsstovnar skulu takast við á fíggjarlóg/roknskapin. Í fleiri ár er § 6 ár fíggjarlógini "Landsstovnar" við mótkonto á § 23 "At leggja í ymiskar grunnar" nýtt til ávísar av teim størru stovnunum, ið hava egnan roknskap, og sum í størri ella minni mun fíggja virksemið sítt við gjøldum sambært lóg. Seinnu árini er hetta broytt og nakrir landsstovnar eru nú als ikki við á fíggjarlógini, tí gjøldini, ið innkravd verða sambært lóg, eru størri enn útreiðslurnar, ið ofta verða uppgjørdar eftir ymiskum meginreglum m.a. viðvíkjandi roknskaparligum avskrivingum og avsetingum (virðismeting av aktivum).

Sambært stýrisskipanarlógini má eingin útreiðsla haldast uttan heimild í fíggjarlóg ella aðrar galdandi heimildarlóg. Mett verður, at rættast er, at rakstrarútreiðslur og mettar inntøkur hjá øllum landsstovnum eiga at vera tiknar við á fíggjarlógina eftir nærri reglum. Landsstýrið arbeiðir annars við eini leiðbeining viðvíkjandi meginreglum í sambandi við fíggjarlógarviðgerð og ætlandi verða hesi viðurskifti avklárað í sambandi við fíggjarlógina fyri 1994. Í hesum sam-

bandi kann hugsast, at ásett verður, at allir landsstovnar verða tiknir við á fíggjarlógina eftir somu meginreglum, og at hesum verður álagt, t.d. hvønn mánað at fráboða í fáum høvuðspostum roknskaparupplýsingar til skrásetingar í einum meir fullfíggjaðum landsroknskapi.

Umframt allar landsstovnar v.m. verða reglurnar um roknskaparhald landsins sambært § 2, stk. 1, eisini at galda fyri sjálvsognarstovnar v.m. hvørs rakstrarætlan er tikin við á játtanarlóg á jøvnum føti við landsstovnar v.m. Harumframt fær landsstýrið sambært § 2, stk. 2, heimild til at gera av, at roknskaparreglurnar eisini kunnu galda fyri aðrar ikki landsstovnar, sum ikki eru við á játtanarlóg, men hvørs rakstur ella hall sum heild verður fíggjað av landinum ella inntøku sambært lóg.

§ 2, stk. 2, nr. 2, fevnir um ikk-landsstovnar, feløg, grunnar v.m, sum bert partvís fáa stuðul av ymiskum slag ella har møguligar inntøkur sambært lóg ikki fíggja allan raksturin. Í teimum førum, landsstýrið kann gera av, at almennu roknskaparreglurnar eisini skulu galda tílíkar stovnar v.m, skal talan vera um, at stuðulin v.m. skal hava munandi týdning fyri móttakaran. Í § 2, stk. 3, er heimildin hjá landstsýrinum eisini avmarkað í tann mun tað í aðrari lóggávu eru ásettar roknskaparreglur.

**Til § 3**

Sambært lógaruppskotið fær landsstýrið heimild til at áseta nærri reglur fyri landsins almenna roknskaparhald í kunngerð, sum t.d. ásetir 1. hvørjar uppgávur roknskaparhald landsins skal loysa, 2. hvørjir stovnar rokskaparhaldið skal fevna um, 3. hvussu roknskaparhaldið skal verða fyriskipað, 4. krøv um roknskaparførslu, 5. krøv til roknskaparframløgu og 6. um arbeiðsgongdir og eftirlit í sambandi við m.a. út- og inngjaldingar á almennum stovnum v.m.

Tað er neyðugt, at landsstýrið í sambandi við, at lógarkarmurin í grein 3 í lógaruppskotinum verður fyltur út, ráðførir seg við teir stovnar, skipanin kemur at fevna um. Í hesum sambandi fer landsstýrið eisini at taka støðu til leiklut gjaldstovunnar. Neyðugt er eisini, at lógarkarmurin ikki verður útfyltur við ásetingum, sum stovnar v.m. ikki eru fyrireikarðir at umsita eftir. Neyðugt er, at farið verður stigvíst fram soleiðis, at menningin og ásetingarnar fylgjast.

Almennir roknskapir og fíggjarlóg hanga tætt saman. Tí er neyðugt at gjørd verður ein leiðbeining fyri arbeiðinum við fíggjarlóg. Nógv av teimum ivamálum sum eru í dag t.d., hvørjir almennir stovnar skulu takast við á fíggjarlógina og á hvønn hátt, vildu verið loyst um landsstýrið/løgtingið gjørdu greiðar reglur fyri hesum. Mett verður ikki, at tílíkar ásetingar nýtast at vera lógarfestar, um so er, at tað á fíggjarlógini verður víst til hesar reglur. Tílíkar reglur vildu eisini gjørt tað einfaldari at umsitið lógina um almenna roknskaparhald landsins, og ásetingar í

eini tílíkari leiðbeining koma at hava stóran týdning fyri, hvussu tann karmurin, sum lógin inniheldur skal útfyllast.

**Til § 5**
Somuleiðis fær landsstýrið heimild til at áleggja almennum stovnum v.m. at gera eina reglugerð um, hvussu roknskaparhaldið skal skipast og fer landsstýrið í samráð við umsitingina og almennar stovnar at tilevna eitt umfarskriv við nærri krøvum hesum viðvíkjandi.

## Felagsálit

### í

*Løgtingsmálum nr. 162/1992: Løgtingslóg um landsins almenna roknskaparhald, 174/1992: Grannskoðan av almennum roknskapum løgtingslóg um løgtingsgrannskoðararnar, 175/1992: Grannskoðan av almennum roknskapum løgtingslóg um grannskoðan av landsins almennu roknskapum v.m. 176/1992: Grannskoðan av almennum roknskapum reglugerð um val og virki løgtingsgrannskoðaranna.*

*Løgtingsmál nr. 162/1992:* Løgtingslóg um landsins almenna roknskaparhald, varð lagt fram av landsstýrinum tann 24. mars 1993 og eftir 1. viðgerð tann 29. mars 1993 beint í figgjarnevndina.
*Løgtingsmálini nr 174/1992:* Grannskoðan av almennum roknskapum løgtingslóg um løgtingsgrannskoðararnar,
*175/1992:* Grannskoðan av almennum roknskapum løgtingslóg um grannskoðan av landsins almennu roknskapum v.m.
*176/1992:* Grannskoðan av almennum roknskapum reglugerð um val og virki løgtingsgrannskoðaranna vóru framløgd tann 14. apríl 1993 og eftir 1. viðgerð tann 19. apríl 1993 beind í figgjarnevndina.

Figgjarnevndin hevur viðgjørt málini.

Tá ætlaðu lógirnar ikki skulu fáa gildi fyrr enn 1. januar 1994 er figgjarnevndin samd um at leggja álit fram í ólavsøkutingsetuni, eisini tí at nevndin ynskir at fáa greiðu á nøkrum fáum ivaspurningum í lógunum til ta tíð.

**Ískoytisálit**

**í**

*Løgtingsmálum nr. 162/1992: Løgtingslóg um landsins almenna roknskaparhald,*
*174/1992: Grannskoðan av almennum roknskapum løgtingslóg um løgtings-grannskoðararnar,*
*175/1992: Grannskoðan av almennum roknskapum løgtingslóg um grannskoðan av landsins almennu roknskapum v.m.*
*176/1992: Grannskoðan av almennum roknskapum reglugerð um val og virki løgtingsgrannskoðaranna.*

Ein samd nevnd setir fram soljóðandi:

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið samtykkir at fíggjarnevndin sum millumtinganevnd arbeiðir víðari við málinum og leggur fram álit í komandi tingsetu.

# 163. Løgtingslóg um løggildar grannskoðarar

**Uppskot**

**til**

*Løgtingslóg um løggildar grannskoðarar.*

*Lagtingslov om statsautoriserede revisorer.*

**Kapittul 1.**

**§ 1.**

Tann føroyski skrásetingarmyndugleikin tilnevnir løggildar grannskoðarar.

**Stk. 2.** Rætt at verða tilnevndur sum løggildar grannskoðari hevur tann, sum

1) hevur bústað í Føroyum,
2) er myndigur og ikki undir verju,
3) hevur ikki boðað frá gjaldsstøðgi ella hevur egið búgv trotaviðgjørt,
4) hevur staðið eina serliga prógvtøku, samanber § 4,
5) í minsta lagi í 3 ár eftir at hava fylt 18 ár, hevur luttikið í øllum vanligum grannskoðanararbeiðum á skrivstovu hjá einum løggildum grannskoðara og
6) hevur tryggjað ella lagt trygd fyri í minsta lagi kr. 500.000 ímóti fíggjarligari ábyrgd, ið kann gerast galdandi við at útinna arbeiðið sum løggildur grannskoðari.

**Stk. 3.** Tilnevning kann verða noktað undir umstøðum, sum eru nevndar í borgarligari revsilóg § 78, 2. stk. Ilervidari kunngerð hevur ásetingar um, hvussu tilnevning skal fara fram, og um, hvussu tann, sum tilnevndur er, skal halda seg.

**1. kapittel.**

**§ 1.**

Autoriserede revisorer beskikkes af den færøske registreringsmyndighed.

**Stk. 2.** Ret til af få beskikkelse som autoriseret revisor har enhver person, der

1) har hopæl på Færøerne, er myndig og ikke under lavværgemål,
3) ikke har anmeldt betalingsstandsning og ikke er under konkurs,
4) har bestået en særlig eksamen, jf § 4,
5) i mindst 3 år efter det fyldte 18. år på en autoriseret revisors kontor har deltaget i udførelsen af de der almindeligt forekommende revisionsarbejder og
6) har forsikret eller stillet sikkerhed for mindst 500.000 kr. mod økonomisk ansvar, som måtte pådrages under udførelsen af hvervet som autoriseret revisor.

**Stk. 3.** Beskikkelse kan nægtes under de i borgerlig straffelovs § 78, stk. 2, nævnte omstændigheder. Endvidere

umframt kann tilnevning noktast, um viðkomandi í yrki ella arbeiði sínum hevur sýnt ein slíkan atburð, at orsøk er til at halda, at viðkomandi ikki vil reka grannskoðarayrki á tryggjandi hátt. Tilnevningin kann eisini noktast persóni, ið skyldar tí alinenna eina týðandi upphædd, ið er gjaldkomin. Týðandi upphædd er at rokna kr. 50.000 ella meiri.

**Stk. 4.** Tann føroyski skrásetingarmyndugleikin kann geva undantøk frá teim treytum, ið nevndar eru í 2. stk., nr. 5.

kan beskikkelse nægtes, såfremt den pågældende i stilling eller erhverv har udvist en sådan adfærd, at der er grund til at antage, at vedkommende ikke vil drive revisionsvirksomhed på forsvarlig måde. Endelig kan beskikkelse nægtes, såfremt den pågældende har betydelig forfalden gæld til det offentlige, hvorved forstås beløb i størrelsesordenen 50.000 kr. og derover.

**Stk. 4.** Den færøske registreringsmyndighed kan undtage fra betingelserne i stk. 2, nr. 5.

**§ 2.**

Tann føroyski skrásetingarmyndugleikin kann tilnevna persónar, sum kunnu ávísa, at teir uttanlands hava fingið eina útbúgving, sum kann javnmetast við ta útbúgving, ið nevnd er í § 1, 2. stk., nr. 4 og 5, og sum annars lúka treytimar í § 1, 2. stk., jvb. 3. stk.

**Stk. 2.** Tann føroyski skrásetingarmyndugleikin kann annars, har serlig viðurskifti gera seg galdandi, loyva útlendskum grannskoðarum í einstøkum førum at røkja starv, har lóggávan krevur, at tað skal vera ein løggildur grannskoðari.

**Stk. 3.** Tilnevning, ið tann føroyski skrásetingarmyndugleikin hevur latið sum ein undantakstilnevning eftir lógini, kann avmarkast og treytast.

**§ 2.**

Den færøske registreringsmyndighed kan beskikke personer, som godtgør i udlandet at have fået en uddannelse, der findes kunne ligestilles med den i § 1, stk. 2, nr. 4 og 5, omhandlede uddannelse, og som iøvrigt opfylder betingelserne i § 1, stk. 2, jf. stk. 3.

**Stk. 2.** Den færøske registreringsmyndighed kan i øvrigt, hvor særlige forhold gør sig gældende, tillade udenlandske revisorer i enkelte tilfælde at varetage hverv, hvortil der i lovgivningen kræves en autoriseret revisor.

**Stk. 3.** Beskikkelse i henhold til en særlig af den færøske registreringsmyndighed i medfør af loven given dispensation kan begrænses og betinges.

**§ 3.**

Fyri at kunna tilnevnast sum løggildur grannskoðari, skal latast eitt serstakt avgjald, ið tann føroyski skrásetingarmyndugleikin ásetir.

**§ 3.**

For beskikkelse som autoriseret revisor betales en af den færøske registreringsmyndighed fastsat afgift.

Hin føroyski skrásetingarmyndugleikin kann taka rættin hjá einum skrásettum grannskoðara at vera í skrásetingini, um viðkomandi skyldar tí almenna eina munandi upphædd, ið er fallin til gjaldingar, við munandi upphædd skilst kr. 100.000 ella meiri. Skrásetingin kann takast aftur frá 1 til 5 ár ella inntil víðari. Við avgerðini skal greiðast frá

**§ 2 a.**

Den færøske registreringsmyndighed kan frakende en registreret revisor retten til at være optaget i registeret, såfremt den pågældende har betydelig forfalden gæld til det offentlige, hvorved forstås beløb i størrelsesordenen 100.000 kr. og derover. Frakendelsen kan ske på tid fra 1 til 5 år eller indtil videre. Afgørelsen skal indeholde op-

hvussu avgerðin kann kærast og um tíðarfreistimar í stk. 2.

**Stk. 2.** Verður ein strikaður úr Grannskoðaraskásetingini eftir stk. 1, kann viðkomandi krevja, at dómstólurin tekur støðu í málinum. Kravið skal setast fyri tí stovni, ið hevur tikið aftur skrásetingina, innan 4 vikur eftir at avgerðin er komin honum í hendi. Myndugleikarnir skulu leggja sak í móti viðkomandi eftir borgarligu revsilógini.

**Stk. 3.** Hóast kravt verður, at dómstólurin skal taka støðu í málinum, kann viðkomandi ikki virka sum skrásettur grannskoðari, men dómstólurin kann avgera, at viðkomandi kann virka sum skrásettur grannskoðari, meðan sakin er til dómsviðgerðar. Verður dómur, sum gevur tí ákærda rætt, kærdur, kann tann dómstólur, sum hevur ella tann dómstólur, ið skal viðgera kæruna avgera, at viðkomandi ikki hevur loyvi at arbeiða sum skrásettur grannskoðari, meðan sakin verður viðgjørd.

lysninger om adgang til domstolsprøvelse efter stk. 2 og om fristen herfor.

**Stk. 2.** En afgørelse i henhold til stk. 1 kan af den, afgørelsen vedrører, forlanges indbragt for domstolene. Anmodning herom skal fremsættes over for den myndighed, der har frakendt beskikkelsen, inden 4 uger efter, at afgørelsen er meddelt den pågældende. Myndigheden anlægger sag mod den pågældende i den borgerlige retsplejes former.

**Stk. 3.** Anmodning om sagsanlæg har ikke opsættende virkning, men retten kan ved kendelse bestemme, at den pågældende under sagens behandling skal have adgang til at udøve virksomhed som registreret revisor. Ankes en dom, hvorved en tilbagekaldelse ikke findes lovlig, kan den ret, der har afsagt dommen, eller den ret, hvortil sagen er indbragt, bestemme, at virksomheden som registreret revisor ikke må drives under ankesagens behandling.

**§ 3.**

Ein skrásettur grannskoðari verður strikaður úr skrásetingini,

1) tá hann doyr,
2) um hann ikki longur lýkur krøvini í § 1, stk. 2, nr. 1, 2, 3 ella 6.
3) um rætturin til at verða upptikin í skrásetingina verður tikin aftur sambært § 11, 2. stk. ella sambært § 79 í borgarligu revsilógini, ella
4) um hann rekur vinnu ella hevur starv, sum ikki kann sameinast við starvið sum skrásettur grannskoð-

**§ 3.**

En registreret revisor slettes i registreret,

1) når vedkommende dør,
2) hvis betingelserne i § 1, stk. 2, nr. 1, 2, 3 eller 6 ikke længere er opfyldt.
3) hvis retten til at være optaget i registeret frakendes efter § 11, stk. 2, eller borgerlig straffelovs § 79, eller
4) hvis den pågældende driver et erhverv eller indtager en stilling, der

ari eftir teimum krøvum, sum føroyski skrásetingarmyndugleikin setur sambært § 8.

**Stk. 2.** Ein skrásettur grannskoðari skal, um føroyski skrásetingarmyndugleikin ynskir tað, innan 1 mánað kunna váttað, at ein trygging er teknað ið lýkur krøvini í § 1, stk. 2, nr. 6. Verður ein tílík váttan ikki útvegað, verður viðkomandi strikaður í skrásetingini.

**Stk. 3.** Verður ein skrásettur grannskoðari strikaður, skal skrásetingarprógvið beinanvegin verða latið inn til føroyska skrásetingarmyndugleikan. Tað sama er galdandi, um viðkomandi verður strikaður eftir § 2 a.

**Stk. 4.** Fellur orsøkin til, at ein skrásettur grannskoðari er strikaður úr skrásetingini burtur, skal viðkomandi skrásetast aftur eftir umsókn og uttan at gjalda skrásetingargjald.

efter de regler, som den færøske registreringsmyndighed fastsætter efter § 8, ikki kan forenes med virksomheden som registreret revisor.

**Stk. 2.** Efter anmodning fra den færøske registreringsmyndighed skal en registreret revisor inden 1 måned godtgøre at være dækket af en forsikring som nævnt i § 1, stk. 2, nr. 6. Godtgøres dette ikke, slettes den pågældende i registeret.

**Stk. 3.** Slettes en registreret revisor, skal registreringsbeviset straks tilbageleveres den færøske registreringsmyndighed. Det samme gælder, hvis revisoren er slettet i registeret efter § 2 a.

**Stk. 4.** Ophører grunden til, at en revisor er slettet, skal den pågældende på ny optages i registeret efter anmodning og uden betaling af afgift.

**§ 4.**

Einans persónar, sum eru skrásettir sum skrásettir grannskoðarar í Grannskoðaraskrásetingini, kunnu nýta heiti "skrásettur grannskoðari".

**§ 4.**

Kun personer, der er optaget i Revisorregisteret, må benytte betegnelsen "registreret revisor".

## Kapittul II

## Virksemið hjá skrásettum grannskoðarum.

**§ 5.**

Skrásettir grannskoðarar og virkir, sum reka bókhalds-, roknskapar- ella grannskoðaravirki við skrásettum grann-

## Kapitel II

## Registrerede revisorers virksomhed.

**§ 5.**

Registrerede revisorer, samt selskaber, som driver bogførings-, regnskabs- eller revisionsvirksomhed med registre-

skoðarum sum luttakarum ella hava tílíkar í starvi, kunnu bert hava meira enn eitt tilhaldspláss, um hvørt plássið er undir leiðslu av einum av virkinum knýttum skrásettum grannskoðara, sum bert er leiðari fyri hesum tilhaldsplássinum.

**Stk. 2.** Hin føroyski skrásetingarmyndugleikin skal hava skrivliga fráboðan, áðrenn ein skrivstovudeild verður latin upp.

rede revisorer som deltagere eller ansatte, må kun have mere end ét kontorsted, hvis hvert kontor ledes af en til virksomheden knyttet registreret revisor, der kun er leder af det pågældende kontor.

**Stk. 2.** Før et kontorsted etableres, skal der indgives anmeldelse herom til den færøske registreringsmyndighed.

§ 6.

Átekningin hjá einum skrásettum grannskoðara á ein roknskap verður, um ikki annað framgongur av átekningini, at rokna sum váttan fyri, at hann hevur grannskoðað roknskapin, og at hann er uppsettur sambært bókhaldinum, og at hann er uppgjørdur við umhygnari sannføring um verandi virðir, rættindi og skyldur, og at hann lýkur tey krøv, ið lógir og møguligar viðtøkur seta um uppseting og framløgu av roknskapi.

**Stk. 2.** Hin føroyski skrásetingarmyndugleikin ásetir nærri reglur fyri átekning grannskoðaranna á roknskapir.

§ 6.

En registreret revisors påtegning på et regnskab anses, medmindre andet fremgår af påtegningen, som udtryk for, at regnskabet er revideret af den pågældende, og at det er rigtigt opstillet på grundlag af bogføringen og opgjort under omhyggelig hensyntagen til bestående værdier, rettigheder og forpligtelser og i overensstemmelse med lovgivningens og eventuelle vedtægters krav til regnskabsaflæggelsen.

**Stk. 2.** Den færøske registreringsmyndighed fastsætter nærmere regler om revisors påtegninger på regnskaber.

§ 7.

Ein skrásettur grannskoðari kann ikki geva váttan frá sær í roknskaparviðurskiftum, tá

1) hann í tænastuviðurskiftum, í hjúnalagi, í føstum samlívsviðurskiftum, í ættlýsingar- ella tilfosturstøkuviðurskiftum ella í ættar- ella svágarviðurskiftum í upp- ella niðurgangandi grein ella í síðu-

§ 7.

Ingen registreret revisor må afgive erklæring i regnskabsmæssige forhold, når

1) den pågældende ved tjenesteforhold, ved ægteskab, ved faste samlivsforhold, ved adoptiv- eller plejeforhold eller ved slægts- eller svogerskab i op- eller nedstigende linie eller i sidelinien så nært som

grein so nær sum børnum hjá systkjum, er knýttur hjá honum, grannskoðanin ynskist framd, ella at bókhaldara ella kassameistara hjá viðkomandi,

søskendebørn er knyttet til den, som har begæret erklæringen, eller hos hvem revision ønskes udført, eller til vedkommendes bogholder eller kasserer,

2) viðkomandi í førum, har váttanin er umbiðin av virkjum ella stovnum, ella grannskoðanin ynskist gjørd hjá hesum, á nakran av teimum undir 1) nevndu hættum er knýttur at limum í nevnd ella stjórn hjá viðkomandi ella at kassameistara ella bókhaldara á virkinum ella stovninum, ella

2) den pågældende i tilfælde af, at erklæringen er begæret af erhvervsvirksomheder eller institutioner, eller revisionen ønskes udført hos disse på nogen af de under 1) angivne måder er knyttet til medlemmer af vedkommende bestyrelse eller direktion eller til virksomhedens eller institutionens kasserer eller bogholder,

3) tað virkið, sum skal hava eina váttan ella ynskir grannskoðan, hevur ein stóran fíggjarligan áhuga fyri tí grannskoðaravirki, sum grannskoðarin er knýttur at,

3) virksomhed, om hvis forhold erklæring ønskes afgivet, eller hos hvem revisionen ønskes udført, har en betydelig økonomisk interesse i den revisionsvirksomhed, hvortil revisor er knyttet,

4) viðkomandi, hjúnarfelagi hjá hesum, foreldur ella børn, ella tann, ið grannskoðarin livir saman við í føstum samlívi, hevur ein týðandi fíggjarligan áhuga í tí virki, váttanin skal latast um, ella har grannskoðast skal, ella

4) den pågældende, dennes ægtefælle, forældre eller børn eller den, som revisor lever sammen med i et fast samlivsforhold, har en mere betydelig økonomisk interesse i den virksomhed, om hvis forhold erklæring ønskes afgivet, eller hos hvem revision ønskes udført, eller

5) tað eru onnur viðurskiftir, sum kunnu vekja iva um grannskoðarin er óheftur.

5) der foreligger andre omstændigheder, der er egnede til at vække tvivl om revisors uafhængighed.

**Stk. 2.** Um ein skrásettur grannskoðari ger grannskoðarauppgávur uttanlands, skulu reglurnar um at vera óheftur, galdandi fyri lógskylduga grannskoðan í tí ávísa landinum, virðast.

**Stk. 2.** En registreret revisor skal ved udførelsen af revisionsopgaver i udlandet iagttage de bestemmelser om uafhængighed, der gælder for lovpligtig revision i vedkommende land.

§ 8.

Skrásettir grannskoðarar skulu gera tey arbeiði, teimum verður litið í hendi við tí umhugsni, gløggleika og skjótleika, ið tað einkulta arbeiðið loyvir, og í samsvar við góðan grannskoðarasið.

**Stk. 2.** Føroyski skrásetingarmyndugleikin kann seta nágreiniligari reglur fyri virkseminum hjá skrásettum grannskoðarum og starvstreytum teirra, og í hesum gera av, at ávísar vinnur og størv ikki kunnu sameinast við slíkt virksemi.

§ 8.

Registrerede revisorer skal udføre de dem betroede hverv med omhu, nøjagtighed og med den hurtighed, som hvervets beskaffenhed tillader, samt i overensstemmelse med god revisorskik.

**Stk. 2.** Den færøske registreringsmyndighed kan i øvrigt fastsætte nærmere regler for registrerede revisorers virksomhed og forretningsbetingelser og herunder bestemme, at visse erhverv og stillinger ikke kan forenes med sådan virksomhed.

§ 8 a.

Føroya Landsstýri kann gera reglur um klaguatgongd fyri avgerðir hjá føroyska skrásetingarmyndugleikanum, m.a. at avgerðirnar ikki kunnu kærast til ein hægri umsitingarligan myndugleika.

§ 8 a.

Færøernes Landsstyre kan fastsætte regler om klageadgangen for afgørelser, der træffes af Den færøske registreringsmyndighed, herunder at afgørelserne ikke kan indbringes for højere administrativ myndighed.

## Kapittul III

## Reglur viðvíkjandi revsing v.m.

§ 9.

Um onkur ger ímóti § 3, stk. 3, § 4, § 5 og § 7, stk. 1 nr. 1-4, og stk. 2, verður viðkomandi revsaður við sekt, um ikki størri revsing er uppiborin sambært lóggávuni annars.

**Stk. 2.** Í reglugerð, sum føroyski skrásetingarmyndugleikin ger sambært hesari lóg, kann sekt verða ásett fyri ikki at halda reglugerðina.

**Stk. 3.** Ein skrásettur grannskoðari, sum í virksemi sínum gevur skeiva skrivliga váttan, ella skrivliga vitnar

## Kapitel III

## Bestemmelser vedrørende straf m.v.

§ 9.

Overtrædelse af § 3, stk. 3, § 4, § 5 samt § 7, stk. 1, nr. 1-4 og stk. 2 straffes med bøde, medmindre strengere straf er forskyldt efter den øvrige lovgivning.

**Stk. 2.** I forskrifter, der gives af den færøske registreringsmyndighed i medfør af loven, kan der fastsættes straf af bøde for overtrædelse af bestemmelser i forskrifterne.

**Stk. 3.** En registreret revisor, der i sin virksomhed afgiver urigtig skriftlig erklæring eller skriftlig bevidner noget,

nakað, sum hann ongan kunnleika hevur um, ella skrivar undir eitt roknskap, sum hann ikki hevur grannskoðað, uttan at hetta framgongur av tí givnu grannskoðaraváttanini, verður revsaður við sekt ella hefti, um ikki størri revsing er uppiborin sambært lóggávuni annars.

hvorom den pågældende ingen kundskab har, eller underskriver på et regnskab, som ikke er revideret af vedkommende, uden at dette fremgår af den afgivne revisionserklæring, straffes med bøde eller hæfte, medmindre strengere straf er forskyldt, efter den øvrige lovgivning.

**§ 10.**

Borgarligu revsilógarinnar §§ 144, 150-152 og 154-157 verða nýttar samsvarandi viðvíkjandi skrásettum grannskoðarum. Viðvíkjandi medarbeiðarum teirra verða §§ 144, 152 og 155 nýttar samsvarandi.

**Stk. 2.** Ein skrásettur grannskoðari, ið sigur seg frá hevur, uttan mun til reglurnar um tagnarskyldu í revsilógini rætt at greiða tí grannskoðara, sum kemur í hansara stað, frá grundini fyri, at hann fer frá.

**§ 10.**

Borgerlig straffelovs §§ 144, 150-152 og 154-157 finder tilsvarende anvendelse på registrerede revisorer. For så vidt angår disses medarbejdere, finder samme lovs §§ 144, 152 og 155 tilsvarende anvendelse.

**Stk. 2.** En registreret revisor, der fratræder et hverv, har uanset straffelovens regler om tavshedspligt ret til at meddele den revisor, der træder i stedet, grunden til sin fratræden.

**§ 11.**

Felagið fyri Skrásettar Grannskoðarar setur niður eina grannskoðarayrkisnevnd, hvørs reglugerð føroyski skrásetingarmyndugleikin skal góðkenna. Í grannskoðarayrkisnevndini sita dómarin, sum er formaður umframt 4 aðrar limir, har 2 skulu vera skrásettir grannskoðarar og 2 skulu umboða roknskapamýtararnar. Verður grannskoðarayrkisnevndin víðkað skulu tað vera líka nógv umboð fyri teir skrásettu grannskoðararnar sum fyri roknskaparnýtararnar. Føroyski skrásetingarmyndugleikin velur allar limirnar í yrkisnevndina, og avgerð hvør, ið er formaður. Skrásetingin kann velja eitt

**§ 11.**

Den færøske Forening af Registrerede Revisorer opretter et Disciplinærnævn, hvis forretningsorden godkendes af den færøske registreringsmyndighed. Disciplinærnævnet består af en formand, der skal være dommer, og mindst 4 andre medlemmer, hvoraf 2 skal være registrerede revisorer og 2 skal være repræsentanter for regnskabsbrugerne. Ved udvidelse af medlemskredsen skal der udnævnes lige mange registrerede revisorer og repræsentanter for regnskabsbrugerne. Nævnets formand og medlemmer udpeges af den færøske registreringsmyndighed, der ligeledes kan udpege en dommer som næstformand.

dómara til næstformann. Formenninir og limirnir verða valdir fyri 4 ár.

**Stk. 2.** Tá ein kæra verður viðgjørd í grannskoðarayrkisnevndini skulu í minsta lagi formaðurin ella næstformaðurin, 1 skrásettur grannskoðari og 1 umboð fyri roknskaparnýtararnar verða við. Eru fleiri luttakarar, skulu altíð vera líka nógvir skrásettir grannskoðarar, sum tað eru umboð fyri roknskaparnýtararnar.

**Stk. 3.** Kærur um, at ein skrásettur grannskoðari ikki hevur hildið sínar skyldur í arbeiði sínum, kunnu sendast grannskoðarayrkisnevndini. Kærur um rokningar frá grannskoðara og kærur um viðurskiftini millum grannskoðarar kunnu ikki sendast grannskoðarayrkisnevndini. Grannskoðarayrkisnevndin skal viðgera allar kærur uttan mun til, um tann kærdi er limur í Felagnum fyri Skrásettum Grannskoðarum ella ikki.

**Stk. 4.** Grannskoðarayrkisnevndin ella formaðurin kunnu noktað at viðgera kærur frá persónum, ið ikki eru partar í málinum, og kærur, sum mett verður onki hald er í. Er ein kæra komin frá føroyska skrásetingarmyndugleikanum, Danska Bankaeftirlitinum, Føroya Landsstýri, ákærumyndugleikanum ella Felagnum fyri Skrásettum Grannskoðarum, skal grannskoðarayrkisnevndin viðgera kæruna.

**Stk. 5.** Føroyski skrásetingarmyndugleikin kann gera reglugerð um, at kærari skal gjalda grannskoðarayrkisnevndini ávíst gjald fyri at viðgera kæruna.

**Stk. 6.** Føroya Landsstýri kann, í samráð við Felagið fyri Skrásettum Grannskoðarum ella ikki.

Formandskab og medlemmer udpeges for en periode af indtil 4 år.

**Stk. 2.** Ved Diciplinærnævnets behandling af en sag skal foruden formanden eller næstformanden mindst deltage 1 registreret revisor og 1 repræsentant for regnskabsbrugerne. Deltager flere medlemmer, skal antallet af registrerede revisorer svare til antallet af repræsentanter for regnskabsbrugerne.

**Stk. 3.** Klager over, at en registreret revisor ved udøvelsen af sin virksomhed har tilsidesat de pligter, som stillingen medfører, kan indbringes for Diciplinærnævnet. Klager over revisors vederlag samt kollegiale sager kan ikke indbringes for Diciplinærnævnet. Diciplinærnævnet skal behandle klagerne uden hensyn til, om indklagede er medlem af den færøske Førening af Registrerede Revisorer.

**Stk. 4.** Diciplinærnævnet eller formanden kan afvise at behandle klager fra personer, der ikke har en retlig interesse i det forhold, klagen angår, samt klager, der på forhånd må skønnes grundløse. Er en klage indbragt af den færøske registreringsmyndighed, Finanstilsynet, Færøernes Landsstyre, anklagemyndigheden eller Foreningen af Registrerede Revisorer, skal Diciplinærnævnet behandle klagen.

**Stk. 5.** Den færøske registreringsmyndighed kan fastsætte regler om, at klageren skal betale et gebyr til Dieiplinærnævnet for at få behandlet en klage.

**Stk. 6.** Færøernes Landsstyre kan, efter aftale med den færøske Forening

Grannskoðarum, gera avtalu við donsku grannskoðarayrkisnevndina (Disiplinærnævnet) um at umsita hetta øki í Føroyum við sama myndugleika sum í Danmark.

for Registrerede Revisorer, indgå aftale med det danske Diciplinærnævn om at overtage administrationen på Færøerne med samme myndighed som i Danmark.

**§ 11. a.**

Grannskoðarayrkisnevndin kann áleggja einum skrásettum grannskoðara, sum ikki heldur tær skyldur, ið starvinum er álagt, eina bót upp á í mesta lagi kr. 200.000.

**Stk. 2.** Um so er, at grannskoðarayrkisnevndin heldur, at vandi er fyri, at viðkomandi verður strikaður í skrásetingini, jfr. § 19 a, stk. 2, í lógini um løggildugar grannskoðarar, ella at neyðugt er, at partarnir ella vitnir verða avhoyrd í rættinum, skal yrkisnevndin senda sakina til grannskoðaranevndina saman við eini vælgrundaðari frágreiðing.

**Stk. 3.** Um so er, at grannskoðaravirkið, sum viðkomandi grannskoðari eigur heilt ella lutvíst ella arbeiðir hjá, hevur medábyrgd fyri teimum viðurskiftum, sum nevnd eru í stk. 1, kann grannskoðaravirkið fáa eina ávaring ella eina bót upp á í mesta lagi kr. 500.000. Grannskoðaravirkið kann bert verða sektað um tað er partur í kæruni, ið send er grannskoðarayrkisnevndini og grannskoðaranevndini.

**Stk. 4.** Grannskoðarayrkisnevndin kann avgera, at ein avgerð skal almannakunngerast.

**§ 11 a.**

Om en registreret revisor i sin virksomhed tilsidesætter de pligter, som stillingen medfører, kan han af Diciplinærnævnet tildeles en advarsel eller pålægges en bøde på ikke over 200.000 kr.

**Stk. 2.** Finder Diciplinærnævnet, at det over for en indklaget kan blive aktuelt at bringe rettighedsfrakendelse i anvendelse jfr. § 19 a, stk. 2 i lov om autoriserede revisorer, eller at det til sagens oplysning er nødvendigt at lade parterne eller vidner afhøre i retten, skal nævnet med en begrundet redegørelse henvise sagen til behandling i Revisornævnet.

**Stk. 3.** Påhviler der den revisionsvirksomhed, hvor den pågældende revisor er indehaver eller er ansat, et medansvar for forhold som nævnt i stk. 1, kan revisionsvirksomheden pålægges en advarsel eller en bøde på ikke over 500.000 kr. Revisionsvirksomheden kan alene pålægges sanktioner, såfremt virksomheden er inddraget som part i en klagesag for Diciplinærnævnet eller Revisornævnet.

**Stk. 4.** Diciplinærnævnet kan bestemme, at en afgørelse skal offentliggøres.

**§ 11 b.**

Avgerðir hjá grannskoðarayrkisnevndini kunnu kærast fyri grannskoðara-

**§ 11 b.**

Diciplinærnævnets afgørelse kan af sagens parter inden 3 måneder efter afgø-

nevndini við eini freist uppá 3 mánaðar. Føroyski skrásetingarmyndugleikin, Danska Bankaeftirlitið, Føroya Landsstýri, ákærumynduleikin og Felagið fyri Skrásettar Grannskoðarar kunnu kæra einahvørja avgerð hjá grannskoðarayrkisnevndini fyri grannskoðaranevndina við somu freist.

**Stk. 2.** Kæra, ið verður send grannskoðaranevndini hevur uppsetandi ávirkan.

relsens meddelelse indbringes for Revisornævnet. Den færøske registreringsmyndighed, Finanstilsynet, Færøernes Landsstyre, anklagemyndigheden og Foreningen af Registrerede Revisorer kan inden for samme frist indbringe enhver afgørelse, der er truffet af Disciplinærnævnet, for Revisornævnet.

**§ 11 c.**

Fyrningarfreistin er 5 ár frá tí degi tá tann umstríddi gerðin ella undanlátið er hildið uppat.

**Stk. 2.** Fyrningarfreistin er ikki galdandi, tá sakin verður kærd til Grannskoðarayrkisnevndina.

**§ 11 c.**

Forældelsesfristen er 5 år regnet fra den dag, da den pligtstridige handling eller undladelse er ophørt.

**Stk. 2.** Forældelsesfristen afbrydes ved indgivelse af klage til Disciplinærnævnet.

**§ 11 d.**

Ísetingarnar í §§ 19-22 í lógini um løggildugar grannskoðarar er eisini galdandi, tá Grannskoðaranevndin viðgerð sakir viðvíkjandi skrásettum grannskoðarum.

**§ 11 d.**

Reglerne i §§ 19-22 i lov om autoriserede revisorer finder anvendelse på Revisornævnets behandling af sager vedrørende registrerede revisorer.

## Kapittul IV

## Nær lógin fær gildi v.m.

## Kapitel IV

## Ikrafttræden og overgangsbestemmelser.

**§ 12.**

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Stk. 2.** Teir persónar sum eru skrásettir grannskoðarar eftir lóg nr. 65 frá 21. mai 1980 verða framvegis skrásettir eftir hesi lógini, tó kann føroyski skrásetingarmyndugleikin krevja, at

**§ 12.**

Loven træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

**Stk. 2.** De personer, som er registrerede revisorer efter lov nr. 65 af 21. maj 1980, beholder deres registrering efter denne lov, den færøske registreringsmyndighed kan dog kræve, at disse

hesir persónar lúka ávís ástøðilig krøv, fyri at teir ikki skulu verða strikaðir.

**Stk. 3.** Føroyski skrásetingarmyndugleikin kann loyva teimum perónum, ið eru eru farnir undir útbúgvingina sum skrásettir grannskoðarar eftir lóg nr. 65 frá 21. mai 1980 áðrenn 1. januar 1993 og sum verða lidnir áðrenn 31. desember 1996, at verða skrásettir í grannskoðaraskrásetingini. Hetta er tó treytað av, at undirvíst verður í øllum lærugreinum minst eitt ár í hesum tíðarskeiði. Um ikki, verður freistin longd tilsvarandi.

**Stk. 4.** Við hesi lóg fer Løgtingslóg nr. 65 frá 21. mai 1980 úr gildi.

personer opfylder bestemte krav til teoretisk uddannelse for at de ikke bliver slettet.

**Stk. 3.** Den færøske registreringsmyndighed kan tillade, at de personer, som er begyndt på uddannelsen som registreret revisor efter lov nr. 65 af 21. maj 1980 før 1. januar 1993 og som har afsluttet uddannelsen før 31. december 1996, bliver optaget i Revisorregisteret. Dette er dog betinget af, at der bliver undervist i samtlige fag mindst et år i denne periode. Hvis ikke bliver fristen tilsvarende udsat.

**Stk. 4.** Samtidig med at denne lov sættes i kraft, ophæves lov nr. 65 af 21. maj 1980.

**Viðmerkingar:**

Víst verður til viðmerkingarnar í viðlagda áliti um roknskaparlóg, bókføringslóg og um lóg fyri grannskoðarar.

**Allt**

**í**

*løgtingsmáli nr. 164/1992: Løgtingslóg um skrásettar grannskoðarar.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 23. mars 1993 og eftir 1. viðgerð 29. mars 1993 beint í rættarnevndina.

Undir viðgerðini hevur Jógvan Joensen, formaður fyri nevndini um roknskaparlóg, bókføringslóg og um lóg fyri grannskoðarar, verið við á fundi.

Uppskotið til nýggja lóg um skrásettar grannskoðarar byggir í stóran mun á galdandi lóg frá 1980, sum er einsljóðandi við ta táverandi donsku. Tær broytingar, sum eru í mun til galdandi lóg eru bert tær dagføringar, sum danska lógin hevur fingið síðani 1980.

Rættarnevndin tekur undir við uppskoti landsstýrisins, men hevur tó onkrar broytingar til málsligar rættingar og setir sostatt fram soljóðandi:

## Broytingaruppskot

## til

## uppskot landsstýrisins

| | | |
|---|---|---|
| 1) | Eingin broyting. | 1) I § 1, stk. 2 ændres "registreret revisor" til: "skrásettur grannskoðari". |
| 2) | Eingin broyting. | 2) I § 1, stk. 2, nr. 5 ændres "hos en autoriseret revisor, en registreret revisor eller hos en revisor" til: "hos en autoriseret revisor eller hos en registreret revisor". |
| 3) | Eingin broyting. | 3) I § 4 ændres "registreret revisor" til: "skrásettur grannskoðari". |
| 4) | Í § 7, stk. 2 verða "uttanlands" og "í tí ávísa landinum" broytt til ávíkavist: "uttanfyri Føroyar" og "á tí ávísa staðnum". | 4) I § 7, stk. 2 ændres "i udlandet" og "i vedkommende land" til henholdsvis: "uden for Færøerne" og "på det pågældende sted". |
| 5) | § 11, stk. 6 verður orðað soleiðis: "Landsstýrið kann í samráð við felagið fyri Skrásettar Grannskoðarar gera avtalu við "Erhvervs- og Selskabsstyrelsen" um, at tann grannskoðarayrkisnevndin, sum í Danmark viðger kærur yvir grannskoðarar, sum eru tiknir upp í føroysku grannskoðaraskránna." | 5) § 11, stk. 6 affattes således: "Landsstyret kan i samråd med den færøske forening for Registrerede revisorer indgå aftale med Erhvervs- og Selskabsstyrelsen om, at det disciplinærnævn, der i Danmark behandler klager over registrerede revisorer, også behandler klager over revisorer, der er optaget i det færøske revisorregister". |
| 6) | Í § 11 a, stk. 1, verður: "eina bót" broytt til: "eina ávaring ella eina bót". | 6) Uændret. |
| 7) | Í § 12, stk. 1, verða orðini: "dagin eftir, at hon er kunngjørd" broytt til: "1. juli 1993". | 7) I "§ 12, stk. 1, ændres ordene: "dagen efter bekendtgørelsen" til: "1. juli 1993". |
| 8) | § 12, stk. 3 verður orðað soleiðis: "Føroyski skrásetingarmyndugleikin kann loyva teimum persónum, ið eru farnir undir útbúgvingi- | 8) § 12, stk. 3 affattes således: "Den færøske registreringsmyndighed kan tillade, at de personer, som er begyndt på uddannelsen som regi- |

na sum skrásettir grannskoðarar eftir lóg nr. 65 frá 21. mai 1980 áðrenn 1. januar 1993, og sum biðja um at verða skrásettir innan 1. februar 1997, at verða skrásettir í grannskoðaraskrásetingini."

streret revisor efter lov nr. 65 af 21. maj 1980 før 1. januar 1993, og som anmoder om registrering inden 1. februar 1997, bliver optaget i revisorregistret."

# 165. Broyting í løgtingslóg um lærlingaviðurskifti

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um lærlingaviðurskifti.*

*lagtingslov om ændring af lagtingslov om lærlingeforhold.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 29 frá 12. oktober 1954 um lærlingaviðurskifti við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 29 af 12. oktober 1954 om lærlingeforhold med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) § 4, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"§ 4. Tilskilað skal verða í lærusáttmálanum, undir hvørjum lønartreytum lærlingur skal arbeiða í lærutíðini. Lærlingalønir verða ásettar av yrkisfeløgunum ella víðkaða læruráðnum, um so er, at yrkisfeløgini ikki hava ásett lønirnar.

1) § 4, stk. 1 affattes således:
"§ 4. Det skal anføres i kontrakten, på hvilke lønvilkår lærlingen skal arbejde i læretiden. Lærlingelønningerne fastsættes af erhvervsorganisationerne eller det udvidede læreråd, såfremt erhvervsorganisationerne ikke har fastsat lønningerne.

**§ 2.**

Henda lóg fær gildi dagin eftir, hon er kunngjørd, fyri lærusáttmálar, sum verða góðkendir, eftir at lógin hevur fingið gildi.

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort, for kontrakter, der godkendes, efter at loven er trådt i kraft.

**Viðmerkingar:**

Sambært § 4, stk. 1 í lærlingalógini frá 30. juni 1983 endurrindar landskassin lærumeistarunum 50% av lógarásettu lærlingalønini, meðan lærlingar ganga á tekniskum skúla.

Útreiðslur landskassans seinastu 4 árini hava verið hesar: 1989: 3,4 mió. kr., 1990: 3,9 mió. kr., 1991: 3,1 mió. kr., 1992: 3,8 mió. kr.

Játtanin á løgtingsfíggjarlógini § 14: Útbúgving og gransking, nýtt rakstrarstað, yrkisútbúgvingar, studningur til læruplass, er 1.700.000 kr. Sambært uppskoti Læruráðsins til fíggjarlógina fyri 1993 vóru lógarfestu skyldur landskassans mótvegis læruplássum mettar til 3.100.000 kr.

Verður lógarbroyting ikki framd, verður landskassin ikki førur fyri at svara lógarásettu skyldum sínum. Av tí at broytingin bert kann gerast galdandi fyri nýggjar lærusáttmálar, slepst tó ikki undan ávísum halli í 1993.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 165/1992: Broyting í løgtingslóg um lærlingaviðurskifti.*

Málið varð lagt fram av undanfarna landsstýri tann 23. mars 1993 og eftir 1. viðgerð tann 1. apríl 1993 beint í mentunnar- og skúlanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 29. apríl. Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Hergeir Nielsen, Jógvan A. Johannessen, Helena Dam á Neystabø og Jógvan Sundstein) vísir á, at sagt verður í uppskotinum hjá undanfarna landsstýri, at landskassin endurrindar helvtina av lógarásettu lærlingalønini, meðan lærlingar ganga á tekniskum skúla, og at lógarfestu skyldur landskassans mótvegis læruplássunum vóru mettar til 3.100.000 kr., samstundis sum sama landsstýrið bert hevur eina játtan upp á 1.700.000 kr. á fíggjarlógini.

Fyri at landsstýrið lutvíst kann svara skyldunum á fíggjarlógini er neyðugt við hesi lógarbroyting, sum kortini bert er galdandi fyri nýggjar lærusáttmálar.

Meirilutin tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja fyriliggjandi uppskot.

Minnilutin (Agnar Nielsen) tekur ikki undir við málinum.

# 166. Broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 21 frá 22. mars 1979 um fólkaskúlan við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 24, stk. 2 verður tímatalið "25" broytt til "27".
2) § 34, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"§ 34. Bý-/bygdarráðið skal skipa fyri flutningi millum skúlar og heim ella nánd av heiminum av næmingum, sum ganga í skúla uttan fyri teirra egnu bústaðarkommunu."
3) § 34, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"Stk. 2. Bý-/bygdarráðið kann harumframt skipa fyri flutningi millum skúlar og heim ella nánd av heimum av niðanfyri nevndu næmingum, sum ganga í skúla í teirra egnu bústaðarkommunu:
1. næmingum upp í 3. árgang, ið hava longri skúlaveg enn 2,5 km., og næmingum í fylgjandi árgangum, ið hava longri skúlaveg enn 3,5 km., og
2. næmingum, ið hava styttri skúlaveg, um so er, at tað er serliga

*lagtingslov om ændring i lagtingslov om folkeskolen.*

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 21 af 22. marts 1979 om folkeskolen med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 24, stk. 2 ændres timetallet "25" til "27".
2) § 34, stk. 1 affattes således:
"§ 34. Kommunalbestyrelsen skal sørge for befordring mellem skoler og hjem eller dettes nærhed af elever, der går i skole uden for deres egen bopælskommune."
3) § 34, stk. 2 affattes således:
"Stk. 2. Kommunalbestyrelsen kan herudover sørge for befordring mellem skole og hjem eller dettes nærhed af nedenfor nævnte elever, der går i skole i deres egen bopælskommune:
1. elever til og med 3. årgang, der har længere skolevej end 2,5 km., og elever i de følgende årgange, der har længere skolevej end 3,5 km., og
2. elever, der har kortere skolevej, hvis hensynet til elevernes sik-

neyðugt fyri tryggleikan hjá næmingunum í ferðsluni, ella um skúlavegurin er ov mikið torførur."

4) § 34, stk. 2-4 verða broytt til stk. 3-5.

5) § 34, stk. 6 verður orðað soleiðis:
"Stk. 6. Tær flutningsskipanir, ið býráðið hevur gjørt sambært stk. 1-4, skulu góðkennast av landsskúlaráðnum."

6) § 34, stk. 7 verður orðað soleiðis:
"Stk. 7. Úr landskassanum verður veittur ein studningur uppá helvtina av útreiðslunum til góðkendar flutningsskipanir eftir stk. 1.

7) § 34, stk. 6 verður broytt til stk. 8, og í hesum stk. 8 verður orðingin "1.-5. stk." broytt til "1.-6. stk." og orðingin "1.-3. stk." broytt til "1. stk.".

kerhed i trafikken gør det særlig påkrævet, eller hvis skolevejen er uforholdsmæssigt besværlig."

4) § 34, stk. 2-4 ændres til stk. 3-5.

5) § 34, stk. 6 affattes således:
"Stk. 6. De befordringsordninger, som kommunalbestyrelsen har indgået i henhold til stk. 1-4, skal godkendes af undervisningsrådet."

6) § 34, stk. 7 affattes således:
"Stk. 7. Af landskassen ydes et tilskud på halvdelen af udgifterne til godkendte befordringsordninger i henhold til stk. 1.

7) § 34, stk. 6 ændres til stk. 8, og i dette stk. 8 ændres formuleringen "1.-5. stk." til "1.-6. stk." og formuleringen "1.-3. stk." til "1. stk."

**§ 2.**

Henda lóg fær gildi 1. august 1993.

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft 1. august 1993.

**Viðmerkingar:**

**Til pkt. 1):**
Við løgtingslóg nr. 101 frá 23. juni 1992 um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan varð talið á kravdum lærugreinum í 8.-9. flokki hækkað, men av tí at bert ein partur av teimum broytingum, sum lesiætlanarnevndin hevði mælt til at fremja, varð tikin við í uppskoti landsstýrisins til umrøddu broytingarlóg, varð vikutímatalið fyri ta skyldugu undirvísingina í nevndu flokkum ikki hækkað samsvarandi.
Sostatt er neyðugt at hækka umrødda vikutímatal úr 25 í 27 tímar.

**Til pkt. 2)-7):**
Í áliti frá fíggjarnevndini, sum er dagfest 21. desember 1992, í løgtingsmáli nr. 14/1992: Fíggjarløgtingslóg 1993 (2. framløga) er í viðmerkingunum frá meirilutanum viðvíkjandi § 14 millum annað tilskilað: "Í fíggjarlógaruppskoti landsstýrisins er eingin játtan til skúlabarnaflutning. Á galdandi fíggjarlóg er játtanin

2,5 mió. kr. Meirilutin heldur, at 1,5 mió. kr. eigur at setast av í 1993, serstakliga at nýta til flutning av skúlabørnum, sum ganga í skúla uttan fyri teirra egnu bústaðarkommunu. Meirilutin ger vart við, at henda játtan er treytað av, at § 34 í løgtingslógini um fólkaskúlan verður broytt."

Pkt. 2 fevnir um ta broyting, sum umrødda lækkaða játtan hevur við sær, og pkt. 3)-7) fevna um fylgibroytingar av nevndu broyting.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 166/1992: Broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan.*

Málið varð lagt fram av undanfarna landsstýri tann 23. mars 1993 og eftir 1. viðgerð tann 1. apríl beint í mentunar- og skúlanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 29. apríl.

Talan er um neyðuga broyting av grein 24 í fólkaskúlalógini, sum stendst av teimum broytingum, sum gjørdar vóru í løgtingslóg nr. 101 frá 23. juni 1992. Talið av kravdum lærugreinum var hækkað við hesi lógarbroyting, uttan at tímatalið varð hækkað samsvarandi, og verður tí mælt til at hækka tímatalið úr 25 upp í 27 tímar.

Hinar lógarbroytingarnar eru til grein 34 í fólkaskúlalógini um flutning av skúlabørnum.

Landsstýrið hevur í fíggjarlógaruppskotinum fyri1993 (2. framløga) onga játtan til skúlabarnaflutning, men eina játtan upp á 2,5 mió. kr. fyri 1992.

Fíggjarnevndin broytti hetta til eina játtan upp á 1,5 mió. kr. fyri fíggjarárið 1993, treytað av, at grein 34 í fólkaskúlalógini varð broytt samsvarandi hesum.

Nevndin hevur viðgjørt skriv frá Runavíkar Kommunu í hesum sambandi, har víst varð á, at kommunan hevur fingið helvtina av kostnaðinum fyri skúlabarnaflutning endurgoldnan úr landskassanum.

Lógarbroyting landsstýrisins sigur, at næmingar bert fáa flutning, um teir ganga í skúla uttanfyri egna bústaðarkommunu, hvar teir, sum er, eiga rætt til flutning, um teir búgva uttanfyri 2,5 km. frá skúlanum og eru í 1.-3. árgangi, og uttanfyri 3,5 km. í fylgjandi árgangum.

Harafturat verður studningurin broyttur til helvtina av útreiðslunum eftir góðkenning frá landsskúlaráðnum.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Hergeir Nielsen, Jógvan A. Johannessen, Helena Dam á Neystabø og Jógvan Sundstein) vísir á, at eingin játtan er tøk, og verður tí mælt til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Agnar Nielsen) tekur undir við broytingaruppskotinum § 1 pkt. 1. Viðvíkjandi punktunum 2 og fylgjandi vísir minnilutin á, at um uppskotið verður samtykt í verandi líki, verða tær kommunur, sum hava nógva koyring innan fyri kommunumark verri fyri. Minnilutin tekur ikki undir við hesum broytingum.

Av tí, at meiriluti tykist vera fyri nevndu broytingum, setir minnilutin fram soljóðandi:

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at finna eina skipan so kommunur, sum hava nógva koyring av skúlabørnum innan fyri kommunumark, kunnu fáa ávíst endurgjald frá landskassanum fyri hesar koyriútreiðslur.

**Broytingaruppskot**

**til**

*løgtingsmál nr. 166/92: Broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan.*

Eftir uppskotinum hjá landsstýrinum verður studningur veittur úr landskassanum til koyring av skúlabørnum millum kommunur, meðan koyring innan kommunumark ikki verður stuðlað.

Summar kommunur, t.d. tær, sum eru fleiri bygdir hava lagt sín skúlabygnað soleiðis til rættis, at nógv koyring er. Henda koyring verður roknað sum ein partur av skúlaútreiðslunum og hevur higartil fingið stuðul.

Ætlanin við hesum broytingaruppskotinum er, at hesar kommunur ikki skulu missa stuðulin til skúlabarnakoyringina.

Samsvarandi omanfyristandandi verður soljóðandi:

**broytingaruppskot**

| | |
|---|---|
| Undir pkt. 6 í landsstýrisins uppskoti: | Under pkt. 6 i landsstyrets forslag: |
| § 34, stk. 7 verður skoytt uppí aftan á "stk. 1": "og stk. 2". | § 34, stk. 7 tilføjes efter "stk. 1": og stk. 2". |

# 167. Íløgustuðul til alivinnuna

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um íløgustuðul til alivinnuna.*

**§ 1.**

Endamálið við hesi lóg er at veita alarum ein tíðaravmarkaðan íløgustuðul, sum verður veittur sum stuðul til smoltkeyp fyri at elva til neyðugar umstruktureringar og umleggingar innan alivinnuna.

**Stk. 2.** Stuðulin verður givin í eitt tíðarskeið upp á 3 ár.

**§ 2.**

Landsstýrinum verður heimilað av árligu játtanini á løgtingsfíggjarlógini fyri 1993, 1994 og 1995 at veita stuðul til útseting av í mesta lagi 5 mió. smolt.

**Stk. 2.** Stuðulin verður latin soleiðis, at alarar á sjónum fáa í meðal 5 kr. fyri hvørt smoltið undir teimum treytum, sum eru givnar í § 3 í hesi lóg.

**Stk. 3.** Hámarksprísur verður settur fyri smoltið, ið skal hava stuðul. Landsstýrið ásetir í reglugerð hámarksprísir á smoltinum eftir stødd og nærri treytir fyri útgjaldingini av stuðlinum.

**§ 3.**

Stuðulin er treytaður av, at alistøðin fær fígging, at samanhang er í rakstrinum og útlit eru fyri, at fiskurin kann alast

*lagtingslov om investeringsstøtte til fiskerierhvervet.*

**§ 1.**

Formålet med denne lov er at yde fiskeopdrætterne en tidsbegrænset investeringsstøtte, som ydes som støtte til smoltkøb med henblik på at tilskynde til nødvendige omstruktureringer og omlægninger inden for fiskeopdrætserhvervet.

**Stk. 2.** Støtten ydes for en periode på 3 år.

**§ 2.**

Landsstyret bemyndiges til af den årlige bevilling på finansloven for 1993, 1994 og 1995 at yde støtte til udsætning af maksimalt 5 mio. smolt.

**Stk. 2.** Støtten ydes således, at havbrugsopdrætterne i gennemsnit får 5 kr. pr. smolt under de betingelser, som fremgår af § 3 i denne lov.

**Stk. 3.** Der fastsættes en maksimalpris for smolt, for hvilket der skal ydes støtte. Landsstyret fastsætter i reglement maksimalpriser for smolt efter smoltstørrelse og nærmere betingelser for udbetalingen af støtten.

**§ 3.**

Støtten er betinget af, at opdrætsstationen får bevilget finansiering, at der er sammenhæng i driften, og at udsigt er

fram til tøku.

§ 4.

Nevnd við umboðum frá landsdjóralæknanum, Fiskirannsóknarstovuni (p/f Fiskaaling) og fiskivinnuumsitingini skal umsita stuðulin, sambært § 2, stk. 3 og § 3.

§ 5.

Lógin fær gildi dagin eftir, hon er lýst.

til, at fisken kan opdrættes frem til slagtning.

§ 4.

Et udvalg med repræsentanter for landsdyrlægen, Fiskirannsóknarstovan (P/F Fiskaaling) og landsstyrets fiskeriafdeling administrerer støtten jfr. § 2, stk. 3 og § 3.

§ 5.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

**Viðmerkingar:**

Bankarnir hava boðað frá, at teir ikki longur hava orku einsamallir at fíggja alivinnuna, og hendir onki, er vandi fyri, at hendan vinnan dettur niðurfyri. Tá alivinnan tey seinastu árini hevur staðið fyri 20% av okkara útflutningsvirði og 1000 - 1200 arbeiðsplássum, vil støðan gerast enn truplari í samfelagnum, um okkurt ikki verður gjørt nú.

Tað høga kostnaðarstøðið hevur verið ein tyngjandi byrða hjá alivinnuni, og má okkum gerast fyri at fáa hetta niður. Mett verður, at um alarar á sjónum fáa stuðul, soleiðis at teir eru førir fyri at keypa smoltið bíligari, so gerast møguleikarnir fyri fígging munandi betur.

Tí verður uppskot lagt fyri tingið um at geva íløgustuðul til smoltútseting í eitt avmarkað tíðarskeið upp á 3 ár, t.d. soleiðis at alarin kann keypa smoltið fyri 6 kr. stk., í meðan smoltstøðin selur smoltið fyri 11 kr. stk. Hetta merkir, at alarar á sjónum kunnu fáa stuðul uppá 5 kr. fyri hvørt útsett smolt.

Ætlanin er, at skipanin skal virka í trý ár, og verður hesin stuðul ikki givin treytaleysur.

Trygd má veitast fyri, at fígging fæst, og at samanhangur er í rakstrinum, soleiðis at fiskurin kann ganga fram til tøku.

Endamálið við hesum íløgustuðli er, umframt at elva til neyðugar umstrukturcringar og umleggingar innan alivinnuna, og at smoltstøðimar eftir hetta trý ára tíðarskeiðið skulu verða førar fyri at framleiða smoltið munandi bíligari enn nú, uttan stuðul.

Alingin á sjónum verður umskipað soleiðis, at strangari veterinær krøv verða sett til tað smoltið, sum verður sett út, harumframt verður skipan gjørd fyri, hvar smoltið verður sett út, soleiðis at strangari krøv kunnu setast til fjarstøðu í mill-

um alistøðirnar. Í stuðulstíðarskeiðinum verður arbeitt fram ímóti eini skiftisøkisætlan fyri alingina á sjónum, og at betra um smittufyribyrgjandi tiltøk á smoltstøðunum.

Fígging skal finnast á verandi fíggjarløgtingslóg fyri 1993.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 167/1992: Íløgustuðul til alivinnuna.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 25. mars 1993 og eftir 1. viðgerð 26. mars 1993 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar. Ein meiriluti (Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Birgir Danielsen, Jørgen Niclasen og Finnbogi Arge) tekur undir við málinum og mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein minniluti (Heini O. Heinesen) tekur støðu í tingsalinum.

Ein minniluti (Asbjørn Joensen) ásannar, at alivinnan er í kreppu og kann tí taka undir við, at ein ávísur tíðaravmarkaður stuðul er rímiligur at veita vinnuni, um vandi er fyri at hon legst fyri. Helst er tað longu ov seint at stuðla verandi alivinnu.

Umr. 30% av føroyska útflutninginum stavaði frá alivinnuni í 1992, og tá ið vit hava í huganum, at eingin stuðul er latin og lítil og eingin innflutningur, so sigur tað seg sjálvt, at samfelagið tolir ikki, at alivinnan doyr.

Men minnilutin kann ikki taka undir við, at hesin stuðulin verður lagdur inn í tann fyrsta framleiðsluliðin, og at stuðulin verður útgoldin beinanvegin eftir stykkjatali á smolti. Eingin trygd er fyri, at sama stykkjatal kemur til tøku.

Stuðul til alivinnuna eigur ikki at vera útgoldin, fyrr enn fiskurin kemur til tøku, fyrr enn ein vøra er liðugt framleidd.

Minnilutin kann tí ikki taka undir við uppskoti landsstýrisins, men heitir á landsstýrið at seta ætlaða peningin á grunn, sum síðani verður útgoldin, tá ið fiskurin verður tikin. Tá fæst trygd fyri stuðli samsvarandi 5 kr./pr. smolt. Men stuðulin verður ikki útgoldin, fyrr enn fiskurin verður útfluttur, og tá reguleraður í mun til ta nøgd, ið kemur til tøku. Tað eggjar øllum pørtum til skilagóðan rakstur og størstu nyttu av stuðlinum. Tí verður sett fram soljóðandi:

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

"Heitt verður á landsstýrið at seta ætlaða peningin til íløgustuðul til alivinnuna í grunn, sum síðani verður útgoldin, tá ið fiskurin verður tikin".

**Broytingaruppskot**

**til**

**3. viðgerð av**

*løgtingsmáli nr. 167/1992: Íløgustuðul til alivinnuna.*

Meirilutin í fíggjarnevndin (Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Anfinn Kallsberg og Birgir Danielsen) setir fram soljóðandi broytingaruppskot til uppskot landsstýrisins:

1) Í § 1 verður sett sum nýtt stk. 2:
"Tað er at tilskila, at við orðinum smolt verður meint laksasmolt og sjóbúgvin síl."
2) § 1 stk. 2, verður § 1 stk. 3.

1) I § 1 indsættes som nyt stk. 2:
"Det understreges, at med ordet smolt menes laksesmolt og havmoden ørred."
2) § 1 stk. 2. bliver § 1 stk. 3.

# 168. Ígildissetan í Føroyum av "Lov om støtte til danske investeringer i østlandene"

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið samtykkir, at lóg nr. 828 frá 19. desember 1989 "om støtte til danske investeringer i Østlandene" verður sett í gildi í Føroyum.

**Viðmerkingar:**

Lógin setir á stovn ein grunn, sum kann veita stuðul til danskar fyritøkur at gera íløgur í Eystanlondum. Herumframt verður heimilað uttanríkismálaráðnum at veita trygd móti fíggjarligum missi av íløgum í hesum londum, um missurin stavar frá politiskum viðurskiftum, so sum ognartøkum, trupulleikum við peningaflutningi, kríggi ella tílíkum í tí landi, har íløgan er gjørd.

Tá tað er ivasamt, um føroyingar hava rætt til stuðul eftir lógini uttan so, at hon er lýst at galda í Føroyum, mælir uttanríkismálaráðið til, at hetta verður gjørt.

# 169. Broyting í ferðslulógini

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu.*

*lagtingslov om ændring i lagtingslov om færdsel.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg um ferðslu, jbr. lógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988 við seinni broytingum verður í § 59 e sett sum stk. 2:

"Stk. 2. Er førararættin vegna rúsdrekka- ella promillukoyring frádømdur í 3 ár ella longri, kann spurningurin um at fáa førararættin aftur tó verða lagdur fyri rættin, tá ið helvtin av frádømingartíðini er liðin. Í hesum førum kann førararættin verða afturveittur, um so er, at avvarðandi í minsta lagi 1 1/2 ár, áðrenn málið verður lagt fyri rættin, hevur hildið eina viðgerð undir eftirliti móti misnýtslu av rúsdrekka."

**§ 1.**

I lagtingslov om færdsel, jfr. lovbekendtgørelse nr. 14 af 2. marts 1988 med senere ændringer tilføjes i § 59 e som stk. 2:

"Stk. 2. Er førerretten som følge af spiritus- eller promillekørsel frakendt for 3 år eller derover, kan spørgsmålet om generhvervelse dog indbringes for domstolene, når halvdelen af frakendelsestiden er forløbet. I disse tilfælde kan førerretten gengives, såfremt den pågældende i mindst 1 1/2 år forud for sagens indbringelse for retten har overholdt en kontrolleret behandling mod misbrug af alkohol."

**§ 2.**

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og er eisini galdandi í førum, har førararættin er frádømdur, áðrenn lógin kom í gildi.

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen og gælder også for tilfælde, hvor førerretten er frakendt før lovens ikrafttræden.

**Viðmerkingar:**

Landsstýrið metir, at ein skipan, lík teirri í Danmark, eigur at verða sett í verk í Føroyum. Skipanin ger tað møguligt, at rætturin kann avgera, at førararættin kann fáast aftur, tá helvtin av frádømingartíðini er liðin. Henda skipan skal virka fremjandi fyri at fólk, ið hava mist koyrikortið vegna rúsdrekkakoyring, lata seg viðgera móti alkoholmisnýtslu.

Tað er ein treyt, at førararættin er frádømdur í 3 ár ella longri, og at viðkomandi í minsta lagi 1 1/2 ár, áðrenn málið verður lagt fyri rættin, hevur hildið

eina viðgerð undir eftirliti móti misnýtslu av rúsdrekka. Er førararættarin mistur fyri alla tíð, kann hesin eftir ásetingini ikki fáast aftur.

Kriminalforsorgin metir, at ein slík lógarbroyting kann setast í verk nærum frá degi til dags, uttan serligan háva hjá nøkrum stovni, tí at viðgerðarskipanin er so væl útbygd í Føroyum og samstarvið millum kriminalforsorgina og viðgerðarstovnarnar er so væl samansjóðað.

Kriminalforsorgin metir eisini, at hetta skuldi bøtt um ferðslutrygdina, minkað um talið á teimum, ið ferð eftir ferð koyra rúsdrekkakoyring og vónandi sum heild minkað um rúsdrekkanýtsluna. Tí heldur kriminalforsorgin, at henda lógarbroyting er eina roynd verd.

Landfútin hevur havt málið til ummælis, og hevur hann onga viðmerking til uppskotnu broytingina.

Landsstýrið mælir løgtinginum til at samtykkja broytingina í ferðslulógini.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 169/1992: Broyting í ferðslulógini.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 30. mars 1993 og eftir 1. viðgerð 1. apríl 1993 beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við Karin Kjølbro, leiðara á Kriminalforsorgini. Landsstýrið hevur sett fram broyting í løgtingslóg um ferðslu. Út frá eini meting um, at ein skipan kann setast í verk í Føroyum, har tað er møguligt, at rætturin kann avgera, at førararættarin kann fáast aftur, tá helvtin av frádømingartíðini er liðin. Henda skipan skal virka fremjandi fyri at fólk, ið hava mist koyrikortið vegna rúsdrekkakoyring lata seg viðgera móti alkoholmisnýtslu.

Nevndin kennir seg ikki sannførda um, at rætta løtan er beint nú at seta uppskotnu lógarbroytingina í gildi og tekur nevndin ikki undir við uppskoti landsstýrisins og setir eingi uppskot fram.

# 170. Broyting í løgtingslóg um evnisskráir hjá almennum myndugleikum

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um evnisskráir hjá almennum myndugleikum.*

*lagtingslov om ændring i lagtingslov om offentlige myndigheders registre.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 62 frá 5. juni 1984 um evnisskráir hjá almennum myndugleikum við seinni broytingum verður í § 9, stk. 2 skoytt upp í sum nýtt 6. punktum:

"Arbeiðsloysistryggingin kann nýta persónnummarið í samskiftinum við Toll- og Skattstovu Føroya í sambandi við eftirlit og umsiting av skipanini. Almannastovan skal fráboða Toll- og Skattstovu Føroya, hvørjir persónar fáa fólkapensjón, avlamispensjón ella aðra líknandi pensjón."

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 62 af 5. juni 1984 om offentlige myndigheders registre med senere ændringer tilføjes i § 9, stk. 2 som nyt 6. punktum:

"Arbejdsløshedsforsikringen kan anvende personnummeret i kommunikationen med Toll- og Skattstovu Føroya i forbindelse med kontrol og administration af ordningen. Almannastovan skal meddele Toll- og Skattstovu Føroya, hvilke personer får folkepension, invalidepension eller anden lignende pension."

**§ 2.**

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

**Viðmerkingar:**

Arbeiðsloysistryggingin hevur heitt á landsstýrið um at fáa broytt lógina, soleiðis, at eisini verður loyvt at nýta persónummarið til eftirlit og umsiting fyri at forða fyri, at skipanin verður misnýtt. Hetta er so at siga ein ógjørlig uppgáva, um persónummarið ikki kann verða nýtt.

Lagt kann verða aftrat, at landsstýrið á vári 1992 setti eina arbeiðsnevnd, ið serliga skal viðgera:

- spurningar viðvíkjandi eintýddari skráseting av persónum og samankoyring av skráum,
- spurningin um datatrygd og starvsskipan fyri skrásetingareftirlitið,
- spurningar sum frítøka frá kravinum um forskriftir fyri minni týðandi skrár og regluharmonisering við grannalondini,
- tryggleikan hjá tí einstaka borgaranum í sambandi við skrásetingarspurningar.

Nevndin er ikki liðug við arbeiði sítt, men heldur hon áfram við arbeiðinum, so vit kunnu fáa eina samlaða lóggávu á økinum.

Landsstýrið mælir løgtinginum til at samtykkja lógarbroytingina.

## Álit

### í

*løgtingsmáli nr. 170/1992: Broyting í løgtingslóg um evnisskrár hjá almennum myndugleikum.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 30. mars 1993 og eftir 1. viðgerð tann 1. apríl 1993 beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Mikkjal Sørensen, Birgir Danielsen og Bjarni Djurholm) taka undir við uppskoti landsstýrisins og mæla til at samtykkja tað.

Meirilutin tilskilar um orðingina í § 1, at P-tal kann nýtast at fáa upplýsingar um inntøkur frá Toll- og Skattstovuni, sum skulu nýtast til útrokningargrundarlagið hjá teimum, ið eru arbeiðsleys.

Trygdarskipan sambært skrásetingarlógina skal verða gjørd, sum skal tryggja, at eingir óviðkomandi upplýsingar fara millum arbeiðsloysistryggingina og Toll- og Skattstovu Føroya. Sostatt kann arbeiðsloysistryggingin ikki fara inn á teldukervið hjá Toll- og Skattstovu Føroya.

Minnilutin (Heðin Mortensen) er ivasamur um at økja nýtsluna av P-talinum og tekur tí ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Signar Hansen) tekur ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

# 171. Broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 39 frá 7. mai 1991 um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 2, stk. 1 og 2 verður skoytt uppí: "sí tó stk. 7."
2) Sum nýtt stk. 6 í § 2 verður sett:
"Stk. 6. Tað av fæi grunsins, sum tann 1. apríl 1993 er yvir 2 mill kr., verður lænt arbeiðsloysistryggingini soleiðis, at 1. apríl 1995 verður helvtin afturgoldin og 1. apríl 1996 verður hin helvtin afturgoldin. Rentan er 5% p.a. Landsstýrinum verður landskassans vegna heimilað at veðhalda fyri hesum láni.
3) Sum nýtt stk. 7 í § 2 verður sett:
"Stk. 6. Í tíðarskeiðinum 1. apríl 1993 til 31. mars 1994 verður inngjaldið til grunnin sambært stk. 1 og 2 latið arbeiðsloysistryggingini."

**§ 2.**

Henda lóg fær gildi 1. apríl 1993.

*lagtingslov om ændring i lagtingslov om arbejdsmarkedspension.*

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 39 af 7. maj 1991 om arbejdsmarkedspension med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 2, stk. 1 og 2 tilføjes: "jfr. dog stk. 7."
2) Som nyt stk. 6 i § 2 indsættes:
"Stk. 6. Fondens kapital udover 2 mill.kr. pr. 1. april 1993 udlånes til arbejdsløshedsforsikringen således, at halvdelen tilbagebetales 1. april 1995 og den anden halvdel tilbagebetales 1. april 1996. Renten er 5% p.a. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for dette lån.
3) Som nyt stk. 7 i § 2 indsættes:
"Stk. 6. I tidsrummet 1. april 1993 til 31. marts 1994 overgår indbetalingen til fonden i henhold til stk. 1 og 2 til arbejdsløshedsforsikringen."

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft 1. april 1993.

**Viðmerkingar:**

Víst verður til viðmerkingarnar til uppskotið um broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.

Uppskotið førir við sær, at bert 2 mill. kr. verða eftir í grunninum, tá fæið verður lænt arbeiðsloysistryggingini.

Harumframt verður inngjaldið í eitt ár somleiðis latið arbeiðsloysistryggingini, hetta merkir at umleið 35 mió. kr. fara at resta í, tá útgjaldið byrjar í 1997, og fer hetta at verða nakað lægri enn roknað varð við, tá lógin varð gjørd.

Landsstýrið heldur tó, at støðan hjá teim arbeiðsleysu er soleiðis, at neyðugt er við hesum stigi.

## Felagsálit

### í

*Løgtingsmáli nr. 171/1992: Broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn.*
*Løgtingsmáli nr. 172/1992: Broyting í løgtingslóg um frítíð við løn.*
*Løgtingsmáli nr. 173/1992: Broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.*

Málini eru løgd fram av landsstýrinum tann 30. mars 1993 og eftir 1. viðgerð undir einum, tann 1. apríl 1993 beind í arbeiðaramálanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við Ingeborg Winther, formann, Føroya arbeiðarafelag, Sigmund Poulsen, advokat, Føroya Arbeiðarafelag, Óla Jacobsen, formann, Føroya fiskimannafelag, Petur Alberg Lamhauge, formann í stýrinum fyri Arbeiðsloysistryggingina og Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar. Meirilutin (Sverre Midjord, Anfinn Kallsberg og Jóannes Klein) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins løgtingsmál nr. 171/1992 og nr. 172/1992 óbroytt, meðan skotið verður upp at broyta orðingina í § 1, stk. 19 í løgtingsmáli nr. 173/1992 samsvarandi hesum:

**broytingaruppskot**

**til**

**uppskot landsstýrisins**

| | |
|---|---|
| Í § 1, stk. 19 verða orðini "Tær lokalu arbeiðsávísingarnar," strikað. | I § 1, stk. 19 udgår ordene "De lokale arbejdsanvisninger," |

Minnilutin Jógvan I. Olsen vísir á, at tá ið lógin um arbeiðsloysistrygging bleiv viðtikin á Føroya løgtingi í fjør førdi undirritaði í álitinum fram millum annað.

Orsakað av búskaparkreppuni í fjør kom málið fram á tingborð og tíðin til at viðgera málið var sera stutt hjá tingmonnum. Arbeiðaramálanevndin hevði bert

stundir til 2 fundir við áhugafeløg. Nógv av hesum feløgum vóru ógvuliga ónøgd við ætlaðu skipanina og skutu upp ymiskar broytingar, men meirilutin vildi ikki gera broytingar og koyrdi uppskotið ígjøgnum, so sum tað var lagt fram av landsstýrinum.

Sambandsflokkurin gekk inn fyri einari arbeiðsloysisskipan, men kundi ikki taka undir við tí uppskoti, sum tá varð lagt fram orsakað av, at vit mettu 2% gjaldið hjá ávíkavist arbeiðstakara og arbeiðsgevara var eykaskattur. Við tí uppskoti mátti løntakarin klára seg við minni í tí dagliga, samstundis sum virkini fingu eina eyka byrðu í eini tíð, tá tey frammanundan høvdu ilt við at klára útreiðslurnar.

Sambandsflokkurin førdi tá fram, at tað serliga vóru tey lønartungu virkini í útflutningsvinnuni, sum komu at merkja byrðarnar harðast. Víst varð á, at tað gjørdist torførari hjá útflutningsvinnuni at skapa nýggj arbeiðspláss, tá byrðarnar øktust. Av tí at vinnan var í stórum fíggjarligum trupulleikum, helt sambandsflokkurin tað vera óðamannaverk at krevja 80 mill. inn frá henni árliga. Úrslitið fór sjálvsagt at verða økt arbeiðsloysi.

Minniluttin mælti tí til, at peningurin til arbeiðsloysisstuðulin varð fingin til vega yvir fíggjarlógina. Hetta kundi partvís gerast við at fremja sparingar innan fløguvirksemið og við at privatisera alment virksemi. Minnilutin vísti tá á, at stórur vandi var fyri, at arbeiðsloysistryggingin bleiv ein mylnusteinur bæði fyri lønmóttakaran og vinnulívið og vísti til orðingina í álitinum hjá arbeiðsbólkinum, har sagt var soleiðis:

*"Um tíðirnar versna og peningur kemur at vænta í, verður tað upp til partarnar á arbeiðsmarknaðinum sjálvar at krevja inn tann pening, sum restar í."*

Niðurstøða Sambandsfloksins tá var at landsstýrissamgongan við tí uppskotinum hevði sloppið sær undan skyldu síni at loysa spurningin um arbeiðsloysisstuðulin yvir fíggjarlógina og at samgongan við hesi skipan sprongdi 50% - skattahámarkið.

Í dag má ásannast, at tað sum vit førdu fram, gjørdist í stóran mun veruleiki.

Sambandsflokkurin hevur ikki broytt støðu í málinum. Flokkurin heldur framvegis, at ov tungar byrðar eru lagdar á partarnar á arbeiðsmarknaðinum. Men flokkurin ásannar, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum hava góðkent eina slíka skipan og noyðist sostatt at taka henda veruleika til eftirtektar.

Sambandflokkurin tekur ikki undir við, at inngjaldingarprostentið verður hækkað úr 2% uppí 2,75%. Partarnir á arbeiðsmarknaðinum orka ikki hesa byrðu aftrat, og mælir flokkurin tí til, at peningurin verður fingin til vega í fløgu - og rakstrarsparingum á fíggjarlógini.

Sum støðan er, tekur flokkurin undir við, at inngjaldingarloftið fyri tær hægru inntøkurnar verður tikið burtur.

Sambandsflokkurin mælir til at taka av arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin og at fæið verður latið til arbeiðsloysistryggingina.

Minnilutin tekur undir við, at "Frítíðargrunnurin" verður latin til skipanina.

Sambært omanfyri nevndu viðmerkjast, setir minnilutin (Jógvan Ingvard Olsen) fram soljóðandi:

**broytingaruppskot**

**til**

**uppskot landsstýrisins**

| | |
|---|---|
| **§ 1.** | **§ 1.** |
| Løgtingslóg nr. 39 frá 7. mai 1991 um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn við seinni broytingum verður sett úr gildi. | Lagtingslov nr. 39 af 7. maj 1991 om arbejdsmarkedspension med senere ændringer sættes ud af kraft. |
| **Stk. 2.** Fæ grunsins verður latið arbeiðsloysistryggingini. | **Stk. 2.** Fondens midler overføres til arbejdsløshedsforsikringen. |
| **§ 2.** | **§ 2.** |
| Henda løgtingslóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. | Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse. |

Minnilutin (Signar Hansen) førir fram: Tjóðveldisflokkurin finst harðliga at landsstýrinum og samgonguni fyri ikki at hava skapt fortreytirnar fyri at fremja arbeiðsskapandi tiltøk. Tær stóru skerjingarnar, ið sitandi samgonga hevur gjørt á fíggjarlógini, hevur borið í sær ein óhugnaligan vøkstur av arbeiðsleysum fólkum, ið ongan møguleika hevur at finna nýggj arbeiðspláss. Ein av avleiðingunum er, at arbeiðsloysisskipanin hevur ikki verið før fyri at goldið arbeiðsloysisstuðulin, so sum lógin ásetir. Uppskotini, ið landsstýrið hevur lagt fyri tingið, skuldu borið í sær, verða tey samtykt, so skuldu tey arbeiðsleysu farið úr teimum 70% av vanligari arbeiðsløn niður í 61%. Tjóðveldisflokkurin heldur ikki, at landsstýrið og landsstýrissamgongan hevur víst serliga gott handalag at finna loysnir, ið partarnir á arbeiðsmarknaðinum eru nøgdir við. Tjóðveldisflokkurin boðaði undir 1. viðgerð av málinum um arbeiðsloysistryggingina, at hann fór at krevja at arbeiðarafeløgini, ið høvdu víst sína misnøgd við framlagda uppskot landsstýrisins, vórðu kallað til fundar í arbeiðaramálanevndini og har bera fram síni sjónarmið.

Tað hevur eydnast, at fingið stýrið fyri arbeiðsloysisskipanina at viðgjørt málið av nýggjum, fyrst og fremst fyri at ganga teimum ynskjum á møti, ið arbeiðarafeløgini hava borið fram.

Tað hevur eydnast at fingið part av teirra ynskjum við, hóast ikki øll, m.a. at útgjaldið verður hækkað úr teimum 61% upp í 67% til 1. september. Harumframt at tað verður landsstýrið sum í framtíðini ger kunngerðir, ið siga, hvussu høgt útgjaldið skal verða, í staðin fyri stýrið, sum í dag tekur avgerðina.

Tjóðveldisflokkurin heldur, at út frá tí, at stýrið hevur tikið undir við hesi broyting, tekur Tjóðveldisflokkurin tí undir við málinum.

# 172. Broyting í løgtingslóg um frítíð við løn

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um frítíð við løn.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 30 frá 7. apríl 1986 um frítíð við løn verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 21, stk. 3 verður aftan á orðið "møgulcikar" sett: "sí tó stk. 5".
2) Sum nýtt stk. 5 í § 21 verður sett:
"Stk. 5. Fæið, sum er í grunninum pr. 1. apríl 1993, verður latið arbeiðsloysistryggingini".

**§ 2.**

Henda lóg fær gildi 1. apríl 1993.

*lagtingslov om ændring i lagtingslov om ferie med løn.*

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 30 af 7. april 1986 om ferie med løn foretages følgende ændringer:

1) § 2, stk. 3 indsættes efter ordet "muligheder": "jvf. dog stk. 5".
2) Som nyt stk. 5 i § 21 indsættes:
"Stk. 5. Fondens midler pr. 1. april 1993 overlades arbejdsløshedsforsikringen".

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft 1. april 1993.

**Viðmerkingar:**

Víst verður til viðmerkingarnar til uppskotið um broytingar í lóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.

Talan er einans um tað fæið, sum er uppspart í grunninum til 1. apríl 1993, og aftan á nevnda dag, verður nýtt fæ spart í grunninum.

Tað er einans um stovnsfæ, sum er "harraleysur" peningur, og ikki pening, sum grunnurin hevur í varðveitslu fyri lønmóttakarar, til hann kann verða útgoldin.

Viðmerkjast kann, at so leingi einki fæ er í grunninum, kann landsstýrið ikki sambært § 18, stk. 2 í lógini loyva útgjalding av frítíðarløn aftaná, at frítíðarárið er endað.

Tá fæið í grunninum fer í arbeiðsloysistryggingina ber ikki longur til at geva undantak frá § 18 1. stk.

# 173. Broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.*

*lagtingslov om ændring i lagtingslov om arbejdsløshedsforsikring og arbejdsanvisning.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 17 frá 10. mars 1992 verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1, stk 1, verður orðað soleiðis:
"Limir í arbeiðsloysistryggingini eru løntakarar, fiskimenn og útróðrarmenn, sum hava bústað í Føroyum, og sum eru undir fullari skattskyldu í Føroyum, hava fylt 16 ár, men ikki fylt 67 ár, sum ikki fáa einkjupensión, framskundaða fólkapensión, varandi hjálp ella sjúkradagpening, og sum eru tøkir á arbeiðsmarknaðinum."
2) Sum nýtt stk. 2 í § 2 verður sett:
"Stk. 2. Eisini verður fæ fingið til vega við láni úr arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum. Hetta lán skal

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 17 af 10. marts 1992 foretages følgende ændringer:

1) § 1, stk. 1, affattes således:
"Medlemmer af arbejdsløshedsforsikringen er lønmodtagere, fiskere og hjemmefiskere, som bor på Færøerne, og er under fuld skattepligt på Færøerne, er fyldt 16 år, men ikke 67 år, som ikke oppebærer enkepension, førtidig folkepension, varig hjælp eller sygedagpenge og er disponible på arbejdsmarkedet."
2) Som nyt stk. 2 i § 2 indsættes:
"Stk. 2. Desuden tilvejebringes kapital med lån fra arbejdsmarkedspensionsfonden. Dette lån skal

vera afturgoldið 1. apríl 1996, og um útgjaldið úr arbeiðsloysistryggingini heldur uppat, skal tó inngjaldið til arbeiðsloysistryggingina halda áfram, til lánið er afturgoldið.

3) Í § 3, stk. 1 verður "2%" broytt til: "2,75%".

4) Í § 3, stk. 2 verður "2%" broytt til: "2,75%".

5) § 3, stk. 3 verður strikað og stk. 4 og 5 verða hereftir stk. 3 og 4.

6) Í § 4, stk. 1 verður "2%" broytt til: "2,75%".

7) Í § 5, stk. 2 verða orðini "sbr. tó § 3, stk. 3" strikað.

8) § 11, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Landsstýrið ásetir eftir ummæli frá stýrinum fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingini útgjaldingarupphæddina pr. dag, sum í mesta lagi kann vera 70% av A-inntøkuni teir seinastu 12 mánaðirnar, býtt við 252 døgum".

9) § 11, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"Stk. 2. Hjá sjálvstøðugt vinnurekandi ásetir landsstýrið eftir ummæli frá stýrinum fyri arbeiðsloysiskipanina og arbeiðsávísingina útgjaldingarupphæddina pr. dag, sum í mesta lagi er grundað á 70% av meðalskattskyldugu inntøkuni tey seinastu 3 árini, býtt við 252 døgum".

10) § 11, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"Stk. 3. Hjá persónum, sum bæði eru sjálvstøðugt vinnurekandi og løntakarar, ásetir landsstýrið eftir ummæli frá stýrinum fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávís-

være tilbagebetalt 1. april 1996, og såfremt udbetalingerne fra arbejdsløshedsforsikringen holder op, skal dog indbetalingerne til arbejdsløshedsforsikringen fortsætte, indtil lånet er tilbagebetalt.

3) I § 3, stk. 1 ændres "2%" til: "2,75%".

4) I § 3, stk. 2 ændres "2%" til: "2,75%".

5) § 3, stk. 3 udgår, og stk. 4 og 5 bliver herefter stk. 3 og 4.

6) I § 4, stk. 1 ændres "2%" til: "2,75%".

7) I § 5, stk. 2 udgår ordene "jfr. dog § 3, stk. 3."

8) § 11, stk. 1 affattes således:
"Landsstyret fastsætter efter indstilling fra bestyrelsen for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen udbetalingsbeløbet pr. dag, der højst kan være 70 % af A-indtægten de sidste 12 måneder, delt med 252 dage."

9) § 11, stk. 2 affattes således:
"Stk. 2. For selvstændige erhvervsdrivende fastsætter landsstyret efter indstilling fra bestyrelsen for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen udbetalingsbeløbet pr. dag, der højst kan være 70% af den gennemsnitlige skattepligtige indkomst de sidste 3 år, delt med 252 dage."

10) § 11, stk. 3 affattes således:
"Stk. 3. For personer, der er selvstændige erhvervsdrivende og lønmodtagere, fastsætter landsstyret efter indstilling fra bestyrelsen forarbejdsløshedsforsikringen og ar-

ingina útgjaldingarupphæddini pr. dag grundað á í mesta lagi 70% av A-inntøkuni teir seinastu 12 mánaðirnar, býtt við 252 døgum, og í mesta lagi 70% av meðalskattskyldugu inntøkuni tey seinastu 3 árini, býtt við 252 døgum. Útgjaldingarupphæddin sambært hesi áseting má saman við møguligari aðrari lønarinntøku/ skattskyldugum avlopi av vinnuvirki tó ongantíð fara upp um ta av landsstýrinum ásettu útgjaldingarupphædd.

11) Í § 11 verður sum nýtt stk. 4 sett:

"Stk. 4. Hjá persónum, sum fáa avlamispensión, men sum partvís eru tøkir á arbeiðsmarknaðinum, verður útgjaldingarupphæddin pr. dag ásett av landsstýrinum eftir ummæli frá stýrinum fyri arbeiðsloysistryggingini og arbeiðsávísingini, grundað á í mesta lagi 70% av A- inntøkuni, sum ikki stavar frá avlamispensiónini, teir 12 seinastu mánaðirnar, býtt við 252 døgum. Útgjaldingarupphæddin má saman við avlamispensjónini ikki fara upp um ta av landsstýrinum ásettu útgjaldingarupphædd".

12) Stk. 4 í § 11 verður hereftir stk. 5 og verður orðað soleiðis:

"Stk. 5. Frá 1. august 1992 til 1. august 1993 kann tryggingartakari krevja, at útgjaldingarupphæddin pr. dag verður grundað á í mesta lagi 70% av A-inntøkuni í einum samlaðum 12 mánaða skeiði seinastu 3 árini, býtt við 252 døgum. Útgjaldingarupphæddin kann tó ikki fara upp um tað av landsstýri-

bejdsanvisningen udbetalingsbeløbet pr. dag, der højst kan være 70% af A-indtægten de sidste 12 måneder, delt med 252 dage, og højst 70% af den gennemsnitlige skattepligtige indkomst de sidste 3 år, delt med 252 dage. Udbetalingsbeløbet efter denne bestemmelse må tillige med øvrige lønindtægter/skattepligtigt overskud af erhvervsvirksomhed ikke overstige det af landsstyret fastsatte udbetalingsbeløb.

11) I § 11 indsættes som nyt stk. 4:

"Stk. 4. For personer, der oppebærer invalidepension, men som delvis er til disposition for arbejdsmarkedet, fastsætter landsstyret efter indstilling fra bestyrelsen for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen udbetalingsbeløbet der højst kan være 70% af A-indtægten, som ikke er invalidepension, de seneste 12 måneder, delt med 252 dage. Udbetalingsbeløbet må sammen med invalidepension ikke overstige det af landsstyret fastsatte udbetalingsbeløb.

12) Stk. 4 i § 11 er herefter stk. 5 og affattes således:

"Stk. 5. Fra 1. august 1992 til 1. august 1993 kan forsikringstager kræve, at udbetalingsbeløbet pr. dag beregnes af højst 70% af A-indtægten i en samlet 12 måneders periode de seneste 3 år, delt med 252 dage. Udbetalingsbeløbet kan dog ikke overstige det af landsstyret fastsatte beløb. Tvivlsspørgsmål

num ásettu upphædd. Ivamál í sambandi við skiftisreglumar í hesum stk. kunnu leggjast fyri stýrið fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina til avgerðar".

13) Stk. 5 verður hereftir stk. 6.

14) Í § 12, stk. 3 verður sum nýtt pkt. sett:

"Stýrið fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina ásetir nærri reglur um, hvørji fiskavirki koma undir ásetingarnar."

15) § 12, stk. 4 verður strikað og stk. 5-14 verða hereftir stk. 4-13.

16) Í § 12 verður sum nýtt stk. 14 sett:

"Stk. 14. Hjá tryggingartakara, sum hevur rætt til frítíðarløn, verður frítíðarlønin mótroknað í arbeiðsloysisstuðlinum, tó í mesta lagi við eini upphædd, sum fyri hvønn dag svarar til 8 tíma arbeiði eftir sáttmálanum millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag og í mesta lagi fyri tað dagatal, sum frítíðarlógin ásetir. Stýrið fyri arbeiðsloysistryggina og arbeiðsávísingina ásetir nærri reglur um, hvussu mótrokning skal fara fram.

17) § 16, stk. 4 verður orðað soleiðis:

"Stk. 4. Til nýtslu í samband við útrokning og eftirlit við útgjaldingarupphæddum eftir hesi lóg kann avgreiðsluskrivstovan útvega sær upplýsingar um inntøku tryggingartakararans frá Føroya Toll- og Skattstovu."

18) Sum nýtt stk. 5 í § 16 verður sett:

"Stk. 5. Avgreiðsluskrivstovan

i forbindelse med overgangsreglerne i dette stk. kan forelægges for bestyrelsen for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen til afgørelse."

13) Stk. 5 bliver herefter stk. 6.

14) I § 12, stk. 3 indsættes som nyt sidste pkt.:

"Bestyrelsen for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen fastsætter nærmere regler om, hvilke fiskevirksomheder omfattes af bestemmelsen."

15) § 12, stk. 4 udgår og stk. 5-15 bliver herefter stk. 4-13.

16) I § 12 indsættes som nyt stk. 14:

"Stk. 14. Hos forsikringstager, som har ret til feriepenge, modregnes feriepengene i arbejdsløshedsunderstøttelse, dog højst med et beløb, som pr. dag svarer til 8 timers arbejde efteroverenskomsten mellem Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag og højst for det antal dage, som ferieloven fastsætter. Bestyrelsen for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen fastsætter nærmere regler om, hvordan modregningen foretages."

17) § 16, stk. 4 affattes således:

"Stk. 4. Til brug i forbindelse med beregning og kontrol efter denne lov, kan ekspeditionskontoret skaffe sig oplysninger fra Føroya Toll- og Skattstovu om forsikringstagerens indkomster."

18) Nyt stk. 5 i § 16 affattes således:

"Stk. 5. Ekspeditionskontoret kan

kann útvega sær upplýsingar frá Almannastovuni, um persónar fáa avlamispensión, einkjupensión, framskundaða fólkapensión ella sjúkradagpening."

19) Sum nýtt stk. 6 í § 16 verður sett:

"Stk. 6. Tær lokalu arbeiðsávísingarnar, fakfeløg og arbeiðsgevarar hava skyldu at geva avgreiðsluskrivstovuni tær upplýsingar, hon biður um í sambandi við eftirlitsarbeiðið.

20) Sum nýggj § 21 verður sett:

"§ 21. Landsstýrið kann saman við ríkismyndugleikunum eftir ummæli frá stýrinum fyri arbeiðsloysis- tryggingina og arbeiðsávísingina gera sáttmála við onnur lond um arbeiðsloysistrygging.

Stk. 2. Landsstýrið kann eftir ummæli frá stýrinum fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina gera sáttmála við myndugleikarnar í Danmark og Grønlandi um arbeiðsloysistrygging

Stk. 3. Landsstýrið kann eftir ummæli frá stýrinum fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina áseta nærri reglur um arbeiðsloysistrygging v.m. fyri teir persónar, sum fevndir eru av sáttmálum sambært hesi grein."

21) § 21 verður hereftir § 22 og verður stk. 4 strikað.

§ 2.

Henda lóg fær gildi 1. apríl 1993.

skaffe sig oplysninger fra Almannastovan om, hvorvidt personer oppebærer invalidepension, enkepension, førtidig folkepension eller sygedagpenge."

19) Nyt stk. 6 i § 16 affattes således:

"Stk. 6. De lokale arbejdsanvisninger, fagforeninger og arbejdsgivere har pligt til at give de oplysninger, ekspeditionskontoret anmoder om i forbindelse med kontrolarbejde."

20) Ny § 21 affattes således:

"§ 21. Landsstyret kan sammen med rigsmyndighederne efter indstilling fra bestyrelsen for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen indgå overenskomst med andre lande om arbejdsløshedsforsikring.

Stk. 2. Landsstyret kan efter indstilling fra bestyrelsen for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen indgå overenskomst med Danmark og Grønland om arbejdsløshedsforsikring.

Stk. 3. Landsstyret kan efter indstilling fra bestyrelsen for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisningen fastsætte nærmere bestemmelser om arbejdsløshedsforsikring m.m. for personer, som er omfattet af overenskomster ifølge denne paragraf."

21) § 21 bliver herefter § 22 og stk. 4 udgår.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. april 1993.

**Stk 2.** Til 1. august 1993 verður útgjaldingarupphæddin hóast ásetingina í § 1, nr. 5 grundað á í mesta lagi 70% av A-inntøkuni teir seinastu 12 mánaðirnar, áðrenn arbeiðsloysið hjá tí tryggjaða verður staðfest, býtt við 252 døgum.

**Stk. 3.** Til 1. august 1993 verður útgjaldingarupphæddin hóast ásetingina í § 1, nr. 6 grundað á hægst 70% av meðalskattskyldugu inntøkuna tey seinastu 3 árini, áðrenn persónliga arbeiði hansara í virkinum er hildið uppat, býtt við 252 døgum.

**Stk. 4.** Til 1. august 1993 verður útgjaldingarupphæddin hóast ásetingina í § 1, nr. 7, 1. pkt. grundað á í mesta lagi 70% av A-inntøkuni teir seinastu 12 mánaðirnar, áðrenn arbeiðsloysið hjá tí tryggjaða verður staðfest og á meðalskattskyldugu inntøkuna tey seinastu 3 árini, áðrenn persónliga arbeiði hansara í virkinum er hildið uppat, býtt við 252 døgum.

**Stk. 2.** Til 1. august 1993 er udbetalingsbeløbet trods bestemmelsen i § 1, nr. 5 baseret på højst 70% af A-indtægten de seneste 12 måneder inden ledigheden hos den forsikrede bliver konstateret, delt med 252 dage.

**Stk. 3.** Til 1. august 1993 er udbetalingsbeløbet trods bestemmelsen i § 1, nr. 6 baseret på højst 70% af den gennemsnitlige skattepligtige indkomst de sidste 3 år, inden hans personlige arbejde i virksomheden ophørte, delt med 252 dage.

**Stk. 4.** Til 1. august 1993 er udbetalingsbeløbet trods bestemmelsen i § 1, nr. 7, pkt. 1 baseret på højst 70% af A-indtægten de seneste 12 måneder inden ledigheden hos den forsikrede bliver konstateret og på den gennemsnitlige skattepligtige indkomst de sidste 3 år, inden hans personlige arbejde i virksomheden ophørte, delt med 252 dage.

**Viðmerkingar:**

Tá ið lógin um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing varð samtykt fyri einum góðum ári síðani, var tað fáur, sum roknaði við, at arbeiðsloysið fór at verða nær námind so stórt, sum tað er í dag.

Gongdin í inn- og útgjaldingunum hjá skipanini hevur verið soleiðis:

| | **inngjald** | **útgjald** |
|---|---|---|
| aug. 1992 | 11,8 | 8,3 |
| sept. 1992 | 12,8 | 13,4 |
| okt. 1992 | 11,7 | 17,0 |
| nov. 1992 | 11,2 | 16,1 |
| des. 1992 | 17,6 | 23,9 |
| jan. 1993 | 9,2 | 25,6 |
| feb. 1993 | 10,5 | 29,0 |
| mars 1993 | 2,4 | 28,2 |

(**Viðmerking:** inngjaldið í desember er partvíst inntøkuført við inngjaldingum frá januar. Í inngjaldið fyri mars íresta inntøkur, sum ikki eru inntøkuførdar.)

Í grein 21, 4. petti í lógini um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing er ásett, at lógin skal endurskoðast eitt ár eftir, at útgjalding er byrjað. T.v.s at lógin skuldi endurskoðast 1. august í ár, men støðan hjá skipanini hevur gjørt tað neyðugt at endurskoða lógina nú.

Stóra arbeiðsloysið hevur ført við sær, at einki samsvar er millum inntøkur og útreiðslur hjá skipanini. Sambært lógini er útgjaldingarupphæddin grundað á 70% av teirri upphædd, sum goldin verður fyri 40 tíma arbeiðsviku íroknað frítíðarløn sambært tí til eina og hvørja tíð galdandi sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag. T.v.s at skipanin, sum er, ikki hevur møguleikar at laga útgjaldingina til inntøkurnar.

Eftir útgjaldingina 26. mars 1993 er greitt, at peningur er ikki til eina útgjalding afturat. Tí er neyðugt, at skipanin fær meira pening beinanvegin, umframt at neyðugt verður at laga útreiðslurnar solciðis, at javnvág fæst millum inntøkur og útreiðslur. Hetta hevur landsstýrið bundið seg til í semjuni við donsku stjórnina frá 1. februar 1993.

Landsstýrið fekk bræv frá arbeiðsloysisskipanini, dagfest 18. desember 1992.

Í umrødda brævi verður skotið upp, at inngjaldið til arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin í 1993 og 1994 fer til skipanina, og umframt verður heitt á landsstýrið um at kanna møguleikan fyri, at stovnsfæið eisini fer til skipanina.

Fundur var 5. februar í Tinganesi millum landsstýrið og stýrið fyri arbeiðsloysisskipanina. Her greiddi stýrið frá, at gjaldføristørvurin í 1993, umframt tað í lógini ásetta gjaldið, fór at verða millum 120 og 180 mió. kr. Eisini greiddi stýrið frá teimum ábøtum á lógina, sum vóru í umbúna.

Landsstýrið viðgjørdi málið aftur á landsstýrisfundi 9. februar 1993.

Landsstýrið ásannaði, at tann av stýrinum uppskotna loysnin við inngjaldinum frá arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum ikki var nøktandi.

Landsstýrið boðaði í skrivi, dagfest 10. februar 1993, stýrinum frá, at landsstýrið er positivt mótvegis uppskoti stýrisins um at taka gjaldið til arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin fyri 1993 og møguliga stovnsfæið, men ger samstundis vart við, at hetta krevur lógarbroyting og eisini løgfrøðiligar kanningar. Eisini verður í nevnda skrivi mælt til at finna fram onnur tiltøk.

Stýrið fyri arbeiðsloysisskipanina sendir í skrivi, dagfest 19. februar 1993, landsstýrinum niðurstøðuna frá tveimum fundum, har fíggjarstøðan er viðgjørd. Boðað verður frá, at semja er um hesi tiltøk:

1) Skipanin fær inngjald og fæ frá arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum, sum áður skotið upp.
2) Inngjaldingarloftið, ið er ásett í § 3 í lógini verður fyribils tikið burtur.

3) Lógarbroyting verður gjørd soleiðis, at tað verður møguligt at luttaka í tiltøkum, ið skulu hjálpa til at seta virksemi í gongd.

Síðani hevur málið um at útvega skipanini fígging verið til drúgvar viðgerðir í landsstýrinum og í samgonguni.

16. mars 1993 varð fíggingin av arbeiðsloysisskipanini aftur viðgjørd á landsstýrisfundi.

Ásannandi, at uppskotnu tiltøkini ikki vóru nóg mikið til tess at tryggja skipanina fíggjarliga, varð eisini semja um, at um stýrið mælti til eina hækking av inngjaldinum upp á 0,5%, vildi landsstýrið mæla løgtinginum til tað sama. Sambært § 5 í lógini kann landsstýrið einans eftir uppskoti frá stýrinum broyta inngjaldingarprosentið.

Í spurninginum um stovnsfæið hjá arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum, vístu løgfrøðiligu kanningarnar, at fæið ikki kundi takast, men kundi lænast. Vísandi til hetta, mælti landsstýrið til, at stovnsfæið varð lænt.

24. mars 1993 var landsstýrismaðurin í arbeiðsmarknaðarmálum á fundi við stýrið og legði sjónarmið landsstýrisins fram.

Í skrivi dagfest sama dag boðar stýrið frá, at tað ikki gongur við til at hækka inngjaldið hjá pørtunum.

Á fundi í Tinganesi 25. mars 1993 samtykti samgongan at taka upp tingingar við stýrið, og vórðu hesar settar til 27. mars 1993 kl. 10.00.

Hesar samráðingar førdu við sær, at ein meiriluti í stýrinum mælti landsstýrinum til at fremja tey tiltøk, ið nevnd verða í skrivi frá stýrinum, dagfest 28. mars 1993. Skrivið er viðlagt.

Landsstýrið og samgongan hava viðgjørt uppskot stýrisins, og er semja um hesar broytingar og hesi tiltøk:

1. Inngjaldið verður hækkað úr 2% upp í 2,75% frá hvørjum av pørtunum.
2. Inngjaldingarloftið verður tikið burtur.
3. Inngjaldið frá arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum frá 1. apríl 1993 til 31. mars 1994 fer til skipanina.
4. 40 mió. kr. av fænum hjá arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum verður lænt til skipanina. Afturgjaldstreytirnar verða avtalaðar av báðum stýrunum og lagdar fyri landsstýrið til góðkenningar.
5. Fæið hjá frítíðargrunninum verður latið til skipanina.
6. Útgjaldingarprosentið kann í hægsta lagi vera 70% av eini arbeiðsmannaløn. Landsstýrið ásetir í kunngerð eftir ummæli frá stýrinum útgjaldingarprosentið.

Heitt verður á løgtingið um at geva uppskotinum skjóta viðgerð.

**Viðmerkingar til tær einstøku greinarnar:**

**ad 1)**
Lógin er í verandi líki ikki nóg neyvt orðað um, hvør hevur rætt til stuðul og verður tí skotið upp, at meira nágreiniligt verður sett í lógina, hvør hevur rætt til stuðul.

**ad 2)**
Í greinini verður ásett, at umframt gjald frá arbeiðstakarum og arbeiðsgevarum hevur skipanin lænt fæ úr arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum. Ásett verður, hvussu lánið skal afturgjaldast eins og verður ásett, at um tað skuldi hent, at skipanin steðgar upp so skal inngjaldið sinb. stk. 1 lralda fram til lánið er afturgoldið.

**ad 3,4 og 6)**
Inngjaldið verður hækkað við 0,75%.

**ad 5)**
At greinin verður strikað ber við sær, at tryggingartakarar gjalda til arbeiðsloysisgrunnin av allari inntøku síni í staðin fyri sum er av hægst arbeiðsmannaløn + 15%. Broytingin merkir, at inntøkur grunsins vaksa umleið 10 mill. kr. í ár.

**ad 7)**
Við tað, at løntakarar nú gjalda til arbeiðsloysisgrunnin av allari inntøku sínari er ikki longur neyðugt við undantaksregluni um, at inngjaldið frá arbeiðsgevarum og arbeiðstakarum ikki er líka stórt.

**ad 8, 9 og 10)**
Sum er, ásetir lógin eitt fast prosenttal fyri, hvussu stórur arbeiðsloysisstuðulin er, í løtuni 70%. Landsstýrið skjýtur upp, at 70% verður sett sum hægsta mark, men at útgjaldingarprosentið veður ásett av landsstýrinum eftir ummæli frá stýrinum. Hetta verður gjørt fyri at tryggja, at javnvág til eina og hvørja tíð er millum inntøkur og útreiðslur. Mett verður, at í næstu framtíð verður neyðugt at áseta prosentið hvørt fjórðingsár.

Í lønini, sum arbeiðsloysisstuðulin er roknaður útfrá, er frítíðarløuin íroknað, somuleiðis er í galdandi lóg roknað við einum dagatalið uppá 227, sum er eitt árligt miðalarbeiðsdagatal.

Stýrið fyri arbeiðsloysistryggingina hevur gjørt landsstýrið vart við, at hetta átti at borið við sær, at fólk, sum fáa arbeiðsloysisstuðul fara í feriu uttan stuðul. Skotið verður tí upp, at dagatalið verður arbeiðsdagatal + frítíð tvs. 252 dagar og

at fólk sum fáa arbeiðsloysisstuðul ikki verða noydd úr skipanini uttan so, at tey fáa frítíðarløn úr frítíðargrunni, sí viðmerking til pkt. 16.

Sambært álitinum frá nevndini, sum gjørdi uppskot til skipanina og viðmerkingarnar til sjálva lógina, sí løgtingsmál nr. 77/1991, var fortreytin, at arbeiðsloysisstuðulin skuldi verða í mesta lagi 70% av inntøkuni av teim seinastu 12 mánaðunum.

Orðingin í lógini er ikki í tráð við hetta, men ásetir lógin, at tryggingargjaldið er grundað á inntøkuna teir seinastu 12 mánaðirnar, áðrenn arbeiðsloysið varð staðfest. Skotið verður tí upp at broyta lógina soleiðis, at hon verður í tráð við tað, sum ætlað var. Somuleiðis verður skotið upp, at henda broyting ikki fær gildi fyrr enn 1. august 1993, og hongur hetta saman við, at til 1. august 1993 kunnu tryggingartakarar sambært lógini fáa útgjald grundað á inntøkuna í einum samlaðum 12 mánaða skeiði seinastu 3 árini, býtt við 252.

**ad 11)**
Avlaminspensiónstar kunnu, serliga teir, sum fáa lægstu ella mittastu avlamispensión, í hvussu so er partvís vera tøkir á arbeiðsmarknaðinum. Greinin ásetir at hesir kunnu fáa arbeiðsloysisstuðul, men tó ikki meira enn, at avlaminspensiónin og arbeiðsloysisstuðulin tilsamans geva hægstu upphædd fyri arbeiðsloysisstuðul.

**ad 12)**
sí viðmerking til 8, 9 og 10.

**ad 14)**
Serliga skipanin fyri fiskavirki hevur ført við sær, at ivamál hava stungið seg upp, um eitt virki er eitt fiskavirki ella ikki. Skotið verður tí upp, at stýrið fær heimild at áseta, hvørji virki, tað snýr seg um.

**ad 16)**
Greinin ásetir, at hjá teim arbeiðsleysu, sum fáa frítíðarløn útgoldna úr grunni 1. mai, skal upphæddin mótroknast í arbeiðsloysisstuðlinum, tó í mesta lagi tað, sum svarar til eina arbeiðsmannaløn og í tað dagatal, sum frítíðarlógin ásetir, í løtuni 30 dagar.

**ad 17, 18 og 19)**
Síðan útgjalding byrjaði í august 1993 hevur tað víst seg at vera alneyðugt at kunna hava betur eftirlit við, at fólk sum ikki hava rætt til stuðul, ikki fáa stuðul. Skotið verður tí upp, at avgreiðsluskrivstovan fær betur møguleikar fyri at kanna útgjaldingar. Hetta verður partvís gjørt við, at skipanin kann fáa upplýsingar frá

bæði skattavaldinum og Almannastovuni um inntøkuviðurskifti hjá fólki sum fáa stuðul og við at fakfeløg, arbeiðsgevarar og lokalar arbeiðsávísingar fáa skyldu at geva avgreiðsluskrivstovuni tær upplýsingar, hon biður um.

**ad 20)**
Í hesi grein fær landsstýrið heimild at gera sáttmálar við onnur lond um arbeiðsloysistrygging, soleiðis at fólk sum eru limir í arbeiðsloysistryggingini her fáa limaskap í arbeiðsloysistrygging uttanlands uttan bíðitíð. Upplýsast kann, at samráðingar hava verið við Danmark um henda spurning, og hava danir longu góðtikið okkara skipan.

**ad 21)**
Greinin gevur heimild fyri at seta prosjekt í gongd soleiðis, at arbeiðsleys kunnu arbeiða. Tað eru ikki nakrar ítøkiligar ætlanir um slík stig, men um spurningurin verður aktuellur, heimilar uppskotið hesum í einum ávísum vavi.

# 174. Grannskoðan av almennum roknskapum

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um løgtingsgrannskoðararnar.*

**§ 1.**
Løgtingið velur 4 løgtingsgrannskoðarar og ein tiltaksmann fyri hvønn av hesum.

**§ 2.**
Landsroknskapurin verður latin løgtingsgrannskoðarunum í seinasta lagi 6 mánaðir aftaná, at fíggjarárið er liðið.

**Stk. 2.** Løgtingsgrannskoðararnir gjøgnumganga tann árliga landsroknskapin, og ansa eftir, at allar inntøkur

*lagtingslov om lagtingsrevisorerne.*

**§ 1.**
Lagtinget vælger 4 lønnede lagtingsrevisorer og en stedfortræder for hver lagtingsrevisor.

**§ 2.**
Landsregnskabet afgives til lagtingsrevisorerne senest 6 måneder efter finansårets udløb.

**Stk. 2.** Lagtingsrevisorerne gennemgår det årlige landsregnskab og påser, at samtlige landets indtægter er opført

og útreiðslur landsins eru tiknar við í roknskapinum, og harafturat at eingin útreiðsla er hildin, sum ikki hevur heimild í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg.

**Stk. 3.** Løgtingsgrannskoðararnir kanna, um roknskapurin er rættur, og um farið er fram samsvarandi verandi játtanum, lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði. Teir meta um, um tað í fyrisitingini er sýnt neyðugt fíggjarligt umhugsni í sambandi við umsiting av peningi og øðrum ognum og viðvíkjandi rakstri av teim virkjum, roknskapurin fevnir um.

**Stk. 4.** Løgtingsgrannskoðararnir stuðla løgtingsnevndum at útvega sær grannskoðanarligar upplýsingar.

## § 3.

Løgtingsgrannskoðararnir kunnu í virki sínum sambært § 2 sum grundarlag nýta tær frágreiðingar, ið landsgrannskoðarin letur úr hondum sambært lóg um grannskoðan av landsins almennu roknskapum v.m.

## § 4.

Løgtingsgrannskoðararnir kunnu útvega sær nágreiniligar upplýsingar um øll roknskaparlig viðurskifti við kanningum á staðnum.

**Stk. 2.** Ein og hvør, sum starvast í almennari tænastu hevur skyldu at geva løgtingsgrannskoðarunum tær upplýsingar og tey skjøl, sum løgtingsgrannskoðararnir halda verða neyðugar í starvi teirra.

deri, og at ingen udgift er afholdt uden hjemmel i finansloven eller anden bevillingslov.

**Stk. 3.** Lagtingsrevisorerne kontrollerer, at regnskabet er rigtigt, og at de dispositioner, der er omfattet af regnskabsaflæggelsen, er i overensstemmelse med meddelte bevillinger, love og andre forskrifter samt med indgåede aftaler og sædvanlig praksis. De vurderer, om der er taget skyldige økonomiske hensyn ved forvaltningen af de midler og driften af de virksomheder, der er omfattet af regnskabet.

**Stk. 4.** Lagtingsrevisorerne bistår lagtingets udvalg med fremskaffelse af revisionsmæssige oplysninger.

## § 3.

Lagtingsrevisorerne er berettigede til at lægge de beretninger, der i henhold til lov om revisionen af landets offentlige regnskaber m.m. afgives af landsrevisoren til grund for deres virksomhed i medfør af § 2.

## § 4.

Lagtingsrevisorerne kan ved besigtelser og undersøgelser på stedet søge alle regnskabsmæssige oplysninger nærmere uddybet.

**Stk. 2.** Enhver, som virker i offentlig tjeneste, har pligt til at meddele lagtingsrevisorerne de oplysninger og aktstykker, som de anser fornødne for udøvelsen af deres hverv.

§ 5.

Landsroknskapurin verður lagdur fyri løgtingið til avgerðar saman við endaligum áliti frá løgtingsgrannskoðarunum.

**Stk. 2.** Í endaliga álitinum frá løgtingsgrannskoðarunum verða tær upplýsingar tiknar við, ið nevndar eru í § 19, 2. stk. í lóg um grannskoðan av landsins almennu roknskapum v.m. Áðrenn álitið verður lagt fram, verða løgtingsgrannskoðararnir at greiða møguligar ivasputningar og at greiða frá hesum í álitinum.

**Stk. 3.** Um nakar av løgtingsgrannskoðarunum metir tað verða neyðugt, at løgtingssamtyktir verða gjørdar um ávís mál, ið umrødd verða í tí endaliga álitinum, verður tilmæli hesum viðvíkjandi gjørt saman við viðmerkingunum til málið.

§ 6.

Gjøllari reglur um val av løgtingsgrannskoðarum, virki teirra og samsýning verða at fyriseta í løgtingssamtykt.

§ 7.

Henda lóg kemur í gildi samstundis sum lóg um grannskoðan av landsins almennu roknskapum v.m.

§ 5.

Landsregnskabet forelægges lagtinget til beslutning med lagtingsrevisorernes endelige betænkning.

**Stk. 2.** Latingsrevisorernes endelige betænkning over landsregnskabet omfatter de i § 19, stk. 2 i lov om revisionen af landets offentlige regnskaber m.m. omtalte oplysninger. Inden afgivelse af betænkning søger lagtingsrevisorerne eventuelle tvivlsspørgsmål afklaret og redegør herfor i betænkningen.

**Stk. 3.** Skønner nogen af lagtingsrevisorerne, at en sag, der omtales i den endelige betænkning, gør det, påkrævet, at der træffes lagtingsbeslutning, afgives der indstilling herom i forbindelse med bemærkningerne til sagen.

§ 6.

Nærmere bestemmelser om lagtingsrevisorernes valg og virksomhed fastsættes ved lagtingsbeslutning.

§ 7.

Denne lov træder i kraft samtidig med lov om revisionen af landets offentlige regnskaber m.m.

**Viðmerkingar til lógaruppskotið.**

**Almennar viðmerkingar.**

Galdandi lóg um løgtingsgrannskoðararnar er løgtingslóg nr. 16 frá 26. apríl 1965 um grannskoðing av landsins almennu roknskapum. Henda lóg, ið bert viðvíkur arbeiðinum hjá løgtingsgrannskoðarunum, varð gjørd við teim donsku lógarreglunum um "statsrevisorerne" sum fyrimynd, sum tá vórðu ásettar í "lov nr. 95 frá 4. april 1928".

Í omanfyri nevndu løgtingslóg nr. 16 frá 1965 er í grein 8 ásett, at fíggjarnevndin stílar fyri roknskapargrannskoðanini. Burtursæð frá avtaluni ímillum fíggjarnevndina og "Socialministeriet" í Danmark frá oktober 1991 um grannskoðan av tí partinum av teimum sosialu útreiðslunum, har talan er um ríkisendurgjald, hevur fíggjarnevndin ikki ásett nærri reglur fyri roknskapargrannskoðanina.

Tað er ein týðandi munur á teimum donsku og føroysku almennu grannskoðanarviðurskiftunum, við tað at roknskapargrannskoðanin í Danmark av teimum almennu roknskapunum er lógarfest og í dag nærri fyriskipað í ríkisgrannskoðanarlógini, har eisini grundarlagið fyri virkseminum hjá "statsrevisorerne" er nærri fyriskipað og ásett.

Skotið er upp at gera eina serstaka lóg um roknskapargrannskoðanina, og endamálið við hesum uppskoti um nýggja lóg fyri løgtingsgrannskoðaranar er at tillaga verandi lóggávu til lógaruppskotið um grannskoðan av landsins almennu roknskapum v.m. Hesi bæði lógaruppskotini eru sostatt nær tengd at hvørjum øðrum og eiga at viðgerast undir einum.

Tann størsta broytingin í mun til verandi lóg er, at tað ikki longur er ásett, at løgtingsgrannskoðararnir skulu viðgera hvønn einstakan stovnsroknskap og leggja hann fyri tingið. Sambært uppskotinum til lóg um grannskoðan av landsins almennu roknskapum v.m. er tað nú landsgrannskoðanin, ið fær álagt at gjøgnumganga hesar roknskapir.

Ein høvuðsuppgáva hjá løgtingsgrannskoðarunum verður at gera viðmerkingar til tær frágreiðingar, ið landsgrannskoðarin letur úr hondum, samstundis sum tað í grein 9 í lógaruppskotinum um grannskoðan av landsins almennu roknskapum er ásett, at landsgrannskoðanin stuðlar løgtingsgrannskoðarunum í gjøgnumgongd teirra av landsroknskapinum, og kannar og letur skrivliga frágreiðig um viðurskifti, ið løgtingsgrannskoðararnir ynskja at fáa lýst.

**Viðmerkingar til tær einstøku greinarnar í lógaruppskotinum:**

**Grein 1.**

Í verandi lóggávu er ásett, at løgtingið millum limir sínar velur 4 løgtingsgrannskoðarar, og at valskeið teirra er valskeiðið hjá tí løgtingi, ið valt teir hevur.

Sambært lógaruppskotinum verður løgtingið ikki bundið av at velja tinglimir. Teir politisku flokkarnir kunnu sostatt eisini velja persónar, ið ikki hava sæti á tingi.

Somuleiðis verður skotið upp, at valskeiðið hjá løgtingsgrannskoðarunum verður lagt fast til 4 ár. Endamálið við hesum broytingum er at tryggja, at arbeiðið hjá løgtingsgrannskoðarunum verður meira støðugt, og at teir politisku flokkarnir eisini fáa høvi at velja ímillum fleiri persónar, ið teir meta vælegnaðar at røkja starvið sum løgtingsgrannskoðari teirri vegna.

**Grein 2.**
2. stk. er orðað nakað á sama hátt sum § 3, 1. stk. í verandi lóg.

3. stk. er meira nágreiniliga orðað enn § 3, 2. stk. í verandi lóg, men innihaldið og endamálið er óbroytt.

4. stk. er ein lógarfesting av tí, sum er ásett í verandi løgtingssamtykt um val og virki løgtingsgrannskoðaranna frá 27. mars 1985.

**Grein 3.**
Henda greinin er tann størsta nýskipanin í mun til verandi lóg, við tað at virksemi løgtingsgrannskoðaranna her verður tengt at tí nýggju lógini um grannskoðan av landsins almennu roknskapum v.m.

**Grein 4.**
Henda greinin er orðað eitt sindur øðrvísi enn § 5 í verandi lóg, men innihald og endamál er óbroytt.

**Grein 5.**
Í 1. stk. er ásett, at løgtingsgrannskoðaramir skulu leggja landsroknskapin fyri løgtingið til avgerðir saman við einum endaligum áliti. Tíðarfreistin verður ásett í løgtingssamtykt um val og virki løgtingsgrannskoðaranna, sjá § 6.

Her er talan um eina nýskipan, ið ber í sær, at tingið nú fær høvi til at taka støðu til ein samlaðan landsroknskap út frá einum endaligum áliti, sum eisini umfatar serroknskapir. Sum nú er, hava løgtingsgrannskoðaramir skyldu at leggja hvønn einstakan almennan serroknskap sær fyri tingið.

Í 2. stk. verður virki løgtingsgrannskoðaranna formliga tengt at teim grannskoðanarfrágreiðingum, sum eru nærri fyriskipaðar í § 18 í uppskotinum til lóg um grannskoðan av landsins almennu roknskapum v.m. Sambært grein 19, 1. stk. í uppskotinum um grannskoðan av landsins almennu roknskapum v.m., skulu hesar frágreiðingar, saman við møguligum viðmerkingum frá løgtingsgrannskoðarunum, sendast løgtinginum og landsstýrinum (so hvørt tær verða gjørdar). Eisini er ásett, at landsstýrið í seinasta lagi 4 mánaðir aftaná, at løgtingsgrannskoðaramir hava latið eina frágreiðing, verður at geva løgtingsgrannskoðarunum eina skrivliga fráboðan um tey tiltøk og tær ætlanir, ið frágreiðingin hevur elvt til.

**Grein 6.**
Eins og í núverandi lóg er í uppskotinum ásett, at gjøllari reglur um val av løgtingsgrannskoðarum og virki teirra verða fyrisettar í løgtingssamtykt. Samsýning løgtingsgrannskoðaranna verður nú eisini at áseta í løgtingssamtykt sambært uppskotinum. Uppskot um eina tílíka løgtingssamtykt er viðlagt lógaruppskotinum.

**Grein 7.**
Eftirsum lógin um løgtingsgrannskoðararnar er so nær tengd at lógaruppskotinum um grannskoðan av landsins almennu roknskapum, verður skotið upp, at hesar lógir koma í gildi samstundis.

# 175. Grannskoðan av almennum roknskapum

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um grannskoðan av landsins almennu roknskapum v.m.*

**§ 1.**

Grannskoðanin sambært hesi lóg verður at útinna av einum landsgrannskoðara, ið verður settur av Formannsskapi Føroya Løgtings.

**Stk. 2.** Tilmæli um at seta og loysa úr starvi landsgrannskoðaran verður gjørt av løgtingsgrannskoðarunum til Formansskap Føroya Løgtings. Um formansskapur Føroya Løgtings ikki kann taka undir við tilmæli løgtingsgrannskoðaranna, boðar formaðurin løgtingsgrannskoðarunum frá hesum, og síðani verða hesir at gera eitt nýtt tilmæli. Løgtingsgrannskoðararnir kunnu í hesum føri krevja, at starvið verður lýst leyst av nýggjum.

**Stk. 3.** Landsgrannskoðarin er óheftur í starvi sínum.

**Stk. 4.** Starvið sum landsgrannskoðari kann ikki sameinast við starv sum løgtings- ella fólkatingslimur.

*lagtingslov om revisonen af landets offentlige regnskaber m.m.*

**§ 1.**

Revisionen i henhold til denne lov varetages af en af lagtingets præsidium udnævnt landsrevisor.

**Stk. 2.** Indstilling om udnævnelse og afskedigelse af landsrevisor foretages af lagtingsrevisorerne til lagtingets præsidium. Kan indstillingen ikke tiltrædes af lagtingets præsidium, meddeler formanden dette til lagtingsrevisorerne, som herefter foretager indstilling på ny. Lagtingsrevisorerne kan i dette tilfælde begære nyt opslag af stillingen.

**Stk. 3.** Landsrevisor er uafhængig ved udførelsen af sit hverv.

**Stk. 4.** Stillingen som landsrevisor kan ikke forenes med hvervet som medlem af lagtinget eller folketinget.

**Stk. 5.** Tilmæli frá landsgrannskoðaranum um fíggjarætlan verður latið løgtingsgrannskoðarunum til viðgerðar og hesir senda uppskot um fíggjarætlan við viðmerkingum sínum til Formansskap Føroya Løgtings, ið viðger uppskotið saman við fíggjarætlan løgtingsins.

**Stk. 6.** Landsgrannskoðarin leggur fram roknskapin hjá landsgrannskoðanini, ið er partur av roknskapinum hjá Føroya Løgtingi, og verður grannskoðaður saman við hesum sambært § 2, stk. 2.

**Stk. 7.** Landsgrannskoðarin setir sjálvur starvsfólki síni, og kann sjálvur siga tey úr starvi.

**§ 2.**

**Grannskoðanin fevnir um:**

1) Landsins almennu roknskapir og
2) roknskapir hjá stovnum, feløgum, grunnum v.m. hvørs útreiðslur ella roknskaparliga hall verða goldin við landsstudningi ella við gjøldum, avgjøldum ella aðrari inntøku sambært lóg.

**Stk. 2.** Formansskapur Føroya Løgtings stílar fyri grannskoðanini av roknskapi løgtingsins.

**§ 3.**

Formansskapur Føroya Løgtings kann eftir tilmæli frá Føroya Landsstýri fyri ávís roknskaparøki, sum eru umfatað av § 2, stk. 1 taka avgerð um, at grannskoðanin skal útinnast av ríkisviðurkendum ella skrásettum grannskoðarum.

**Stk. 5.** Landsrevisorens indstillinger vedrørende budgetforslag afgives til lagtingsrevisorerne, som behandler dem og oversender forslaget med deres bemærkninger til lagtingets præsidium, som behandler forslaget sammen med lagtingets budget.

**Stk. 6.** Landsrevisor aflægger Landsrevisionens regnskab, som indgår i lagtingets regnskab og revideres sammen med dette, jf. § 2, stk. 2.

**Stk. 7.** Landsrevisor antager og afskediger selv sine medarbejdere.

**§ 2.**

**Revisionen omfatter:**

1) Landets offentlige regnskaber og
2) regnskaber for institutioner, foreninger, fonde m.v., hvis udgifter eller regnskabsmæssige underskud dækkes ved landstilskud eller ved bidrag, afgift eller anden indtægt i henhold til lov.

**Stk. 2.** Lagtingets regnskab revideres ved foranstaltning af lagtingets præsidium.

**§ 3.**

Lagtingets præsidium kan efter indstilling fra Færøernes Landsstyre for så vidt angår nærmere afgrænsede af de af § 2, stk. 1 omfattede regnskabsområder beslutte, at revisionen skal udføres af statsautoriserede eller registrerede revisorer.

**Stk. 2.** Føroya Landsstýri ásetir á teim roknskaparøkjum, ið stk. 1 fevnir um, nærri reglur fyri grannskoðanina, og tað skal í hesum sambandi tryggjast, at grannskoðanin fer fram eftir góðum almennum grannskoðanarsiði, soleiðis sum hetta er ásett í § 4.

**Stk. 2.** Færøerens Landsstyre fastsætter på de af stk. 1 omfattede regnskabsområder nærmere regler for revisionens udførelse, idet det herved skal tilsikres, at revisionen udføres i overensstemmelse med god offentlig revisionsskik, således som dette begreb er fastlagt i § 4.

**§ 4.**

Undir grannskoðanini verður kannað, um roknskapurin er rættur, og um farið er fram samsvarandi verandi játtanum, lógum og øðrum fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði. Haraftrat verður gjørd ein meting av, um tað í fyrisitingini er sýnt neyðugt fíggjarligt umhugsni í sambandi við umsiting av peningi og øðrum ognum og viðvíkjandi rakstri av teim virkjum, roknskapurin fevnir um.

**§ 4.**

Ved revisionen efterprøves, om regnskabet er rigtigt, og om de dispositioner, der er omfattet af regnskabsaflæggelsen, er i overensstemmelse med meddelte bevillinger, love og andre forskrifter samt med indgående aftaler og sædvanlig praksis. Endvidere foretages en vurdering af, hvorvidt der er taget skyldige økonomiske hensyn ved forvaltningen af de midler og driften af de virksomheder, der er omfattet af regnskabet.

**§ 5.**

Landsgrannskoðarin kann frá Føroya Landsstýri krevja at fáa til kanningar:

1. roknskapir frá stovnum, feløgum, grunnum, v.m, sum fáa kapitalinnskot, studning, lán, veðhald, o.t. ella annan stuðul frá landinum ella frá einum av teimum stovnum v.m., ið nevndir eru í § 2, stk. 1, nr. 2, ella sum fáa gjøld, avgjøld ella aðra inntøku sambært lóg.
2. roknskapir frá teimum stovnum, ið nevndir eru í § 2, stk. 1, har tað sambært § 3 ella við lóg er ásett serlig grannskoðanarskipan.

**§ 5.**

Landsrevisor kan gennem landsstyret kræve forelagt til gennemgang:

1. regnskaber fra institutioner, foreninger, fonde m.v., der modtager kapitalindskud, tilskud, lån, garanti o.l. eller anden støtte fra landet eller fra en af de i § 2, stk. 1, nr. 2, nævnte institutioner m.v. eller som modtager bidrag, afgift eller anden indtægt i henhold til lov.
2. regnskaber for sådanne i § 2, stk. 1 omfattede institutioner, for hvilke der i medfør af § 3 eller ved lov er fastsat en særlig revisionsordning.

§ 6.

Landsgrannskoðarin skal eftir áheitan hava atgongd til at gjøgnumganga tann partin av teimum kommunalu roknskapunum, ið viðvíkur virksemi, har avroknast skal við landið.

§ 7.

Tá ið roknskapir verða gjøgnumgingnir sambært §§ 5 og 6, eigur serliga at verða ansað eftir, at roknskapirnir verða nóg væl grannskoðaðir, at treytirnar fyri studningi v.m. eru loknar, at peningurin er nýttur samsvarandi galdandi reglum, og at tað harumframt í fyrisitingini er sýnt neyðugt fíggjarligt umhugsni í sambandi við umsiting av peningi og øðrum ognum.

§ 8.

Um landið ella eitt av teimum stovnum, ið nevndir eru í § 2, stk. 1, hevur sett pening í eitt virki, skal avvarðandi landsmyndugleiki ella stovnur ráðføra seg við landsgrannskoðaran, tá talan er um týðandi grannskoðanarspurningar, sum hann hevur ávirkan á.

§ 9.

Landsgrannskoðarin stuðlar løgtingsgrannskoðarunum í gjøgnumgongd teirra av landsroknskapinum. Landsgrannskoðarin ger kanningar og frágreiðingar um viðurskifti, ið løgtingsgrannskoðararnir ynskja at fáa lýst. Løgtingsgrannskoðararnir og landsgrannskoðarin kunnu heita á hvønn annan um at halda felags fundir. Landsgrannskoðarin kann eftir áheitan frá

§ 6.

Landsrevisor skal efter anmodning have adgang til at gennemgå den del af de kommunale regnskaber, som vedrører virksomhed, for hvilken der skal ske afregning over for landet.

§ 7.

Ved den i §§ 5 og 6 nævnte gennemgang af et regnskab påses navnlig, at regnskabet er undergivet betryggende revision, at vilkårene for tilskud m.v. er opfyldt, at midlerne er anvendt i overensstemmelse med givne bestemmelser, og at der i øvrigt er taget skyldige økonomiske hensyn ved forvaltningen af midlerne.

§ 8.

Deltager landet eller en af de institutioner, der er nævnt i § 2 stk. 1, gennem kapitalindskud i en virksomhed, skal vedkommende landsmyndighed eller institution rådføre sig med landsrevisor om sådanne revisionsspørgsmål af større betydning, som den har indflydelse på.

§ 9.

Landsrevisor bistår lagtingsrevisorerne ved deres gennemgang af landsregnskabet. Landsrevisor foretager undersøgelser og afgiver beretning vedrørende forhold, som lagtingsrevisorerene ønsker belyst. Lagtingsrevisorerne og landsrevisor kan anmode om afholdelse af fælles møder. Landsrevisor deltager efter lagtingsrevisorernes anmodning i samråd med lagtingsudvalg og

løgtingsgrannskoðarunum luttaka á fundum ímillum løgtingsnevndir og løgtingsgrannskoðararnar.

**Stk. 2.** Landsgrannskoðarin stuðlar landsstýrinum í sambandi við skipan av roknskaparhaldi og roknskaparligum eftirliti.

lagtingsrevisorerne.

**Stk. 2.** Landsrevisor bistår landsstyret ved tilrettelæggelsen af regnskabsførelsen og den regnskabsmæssige kontrol.

**§ 10.**

Landsgrannskoðarin og landsstýrið kunnu gera av, at grannskoðan sambært hesi lóg verður at útinna í einum formliga skipaðum samstarvi ímillum landsgrannskoðaran og eina innanhýsis grannskoðan undir landsstýrinum.

**§ 10.**

Landsrevisor og landsstyret kan aftale, at revisionsopgaver i henhold til denne lov varetages i et nærmere fastlagt samarbejde mellem landsrevisor og et organ for intern kontrol og revision under landsstyret.

**§ 11.**

Teir myndugleikar v.m., ið § 2 stk. 1 fevnir um, skulu geva landsgrannskoðaranum fráboðan um allar ásetanir viðvíkjandi roknskaparhaldi og øðrum viðurskiftum, ið metast kunnu at hava týdning fyri grannskoðanina.

**Stk. 2.** Áðrenn omanfyrinevndu myndugleikar v.m. gera broytingar í roknskaparskipan ella mannagongd, ið hava týdning fyri grannskoðanina, skal landsgrannskoðarin hava høvi til at ummæla hesar.

**§ 11.**

De af § 2, stk. 1 omfattede myndigheder m.v. skal holde landsrevisor underrettet om alle bestemmelser vedrørende regnskabsforhold og andre forhold, der skønnes af betydning for revisionen.

**Stk. 2.** Landsrevisor skal have adgang til at udtale sig, inden en sådan myndighed i sit regnskabssystem eller sin forretningsgang iværksætter forandringer, der har betydning for revisionen.

**§ 12.**

Teir myndugleikar v.m., ið § 2, stk. 1 fevnir um, skulu lata landsgrannskoðaranum roknskaparyvirlit innan ein mánað aftaná, at roknskaparskeiðið er liðið. Landsgrannskoðarin kann leingja hesa freist.

**Stk. 2.** Landsroknskapurin og frágreiðingar um frávik í millum játtanar- og roknskapartøl skal latast landsgrann-

**§ 12.**

De af § 2, stk. 1 omfattede myndigheder m.v. skal afgive regnskabsoversigter til landsrevisor inden en måned efter regnskabsperiodens udløb. Landsrevisor kan forlænge denne frist.

**Stk. 2.** Landsregnskabet samt redegørelser for afvigelser mellem bevillings- og regnskabstal, skal afgives til

skoðaranum í seinasta lagi 6 mánaðir aftaná, at fíggjarárið er liðið.

**Stk. 3.** Avvarðandi landsmyndugleiki hevur eftir áheitan frá landsgrannskoðaranum sum skjótast at senda honum roknskapir, grannskoðanarviðmerkingar og aðrar upplýsingar, ið eru neyðugir í sambandi við ta gjøgnumgongd, ið er nevnd í §§ 5 og 6.

landsrevisor senest seks måneder efter finansårets udløb.

**Stk. 3.** Vedkommende landsmyndighed skal efter landsrevisors anmodning snarest muligt indsende regnskaber, revisionsbemærkninger og andre fornødne oplysninger til brug ved den i §§ 5 og 6 omhandlede gennemgang.

**§ 13.**

Landsgrannskoðarin kann frá einum og hvørjum almennum myndugleika krevja allar tær upplýsingar og tað tilfar, sum hann metir vera av týdningi fyri útinnan av starvi sínum. Landsgrannskoðarin kann áseta eina freist fyri hesum.

**§ 13.**

Landsrevisor kan af enhver offentlig myndighed forlange sig meddelt alle sådanne oplysninger og forelagt alle sådanne aktstykker, som efter landsrevisors skøn er af betydning for udførelsen af landsrevisors hverv. Landsrevisor kan fastsætte en frist herfor.

**§ 14.**

Landsgrannskoðarin kann til eina og hvørja tíð grannskoða og gjøgnumganga roknskapir á tí staði, har roknskaparhaldið fer fram, ella har tað neyðuga tilfarið annars finst.

**§ 14.**

Landsrevisor kan til enhver tid foretage revision og regnskabsgennemgang på det sted, hvor regnskaberne føres, eller hvor det nødvendige materiale i øvrigt findes.

**§ 15.**

Landsgrannskoðarin ásetir reglur um kassa- og goymslueftirlit viðvíkjandi teimum roknskapum, ið nevndir eru í § 2, stk. 1.

**§ 15.**

Landsrevisor fastsætter bestemmelser om afholdelse af kasse- og beholdningseftersyn vedrørende de i § 2 stk. 1 nævnte regnskaber.

**§ 16.**

Landsgrannskoðarin skal eftir áheitan kunna landsstýrið um, í hvønn mun og á hvønn hátt, grannskoðað hevur verið.

**Stk. 2.** Landsgrannskoðarin skal geva landsstýrinum neyðuga fráboðan

**§ 16.**

Landsrevisor, skal efter anmodning give landsstyret oplysninger om arten og omfanget af den revision, der er foretaget.

**Stk. 2.** Landsrevisor skal give landsstyret fornøden underretning om de

um tey viðurskifti, ið verða staðfest undir grannskoðan ella gjøgnumgongd av roknskapum.

**§ 17.**

Allar viðmerkingar frá landsgrannskoðaranum viðvíkjandi grannskoðan og gjøgnumgongd av roknskapum skulu svarast innan seks vikur, um longri freist ikki er ásett av landsgrannskoðaranum.

**Stk. 2.** Um landsgrannskoðarin aftan á lokið brævaskifti ikki kann góðtaka eina støðu, kann landsgrannskoðarin boða landsstýrinum frá síni endaligu støðutakan við áheitan um ummæli frá landsstýrinum innan seks vikur. Landsgrannskoðarin sendir síðani løgtingsgrannskoðarunum málið til viðgerðar í seinasta lagi tríggjar vikur aftaná, at svar er komið frá landsstýrinum, ella at farið er út um nevndu tíðarfreist.

**§ 18.**

Landsgrannskoðarin avstemmar landsroknskapin við serroknskapirnar og samanber játtanar - og roknskapartøl. Landsgrannskoðarin letur løgtingsgrannskoðarunum frágreiðing um hetta innan eina freist, ið avtalað verður millum løgtingsgrannskoðararnar og landsgrannskoðaran.

**Stk. 2.** Landsgrannskoðarin letur eftir lokna viðgerð løgtingsgrannskoðarunum frágreiðing um slík grannskoðanarmál, ið eftir hansara meting eiga at verða umrødd vegna fíggjarligan ella grundleggjandi týdning annars.

**Stk. 3.** Mál, ið verða viðgjørd í frágreiðingini frá landsgrannskoðaranum, ved revisionen og regnskabsgennemgangen konstaterede forhold.

**§ 17.**

Landsrevisors bemærkninger vedrørende revision og gennemgang af regnskaber skal bevares inden seks uger fra modtagelsen, medmindre landsrevisor tillader en længere frist.

**Stk. 2.** Kan landsrevisor efter afslutningen af en brevveksling ikke godtage det indtagne standpunkt, kan landsrevisor meddele sin endelige stillingstagen til landsstyret med anmodning om dettes udtalelse inden seks uger. Senest tre uger efter modtagelsen af landsstyrets svar eller udløbet af nævnte frist fremsender landsrevisor sagen til lagtingsrevisorerne.

**§ 18.**

Landsrevisor afstemmer landsregnskabet med særregnskaberne og sammenholder bevillings- og regnskabstal. Landsrevisor afgiver en beretning herom til lagtingsrevisorerne inden en frist, der aftales mellem lagtingsrevisorerne og landsrevisor.

**Stk. 2.** Landsrevisor afgiver beretning til lagtingsrevisorerne ved afslutningen af sådanne revisionssager, som landsrevisor under hensyn til deres økonomiske eller principielle betydning finder anledning til at omtale.

**Stk. 3.** En sag, der optages i landsrevisors beretning, skal mindst fire uger

skulu leggjast fyri landsstýrið til ummælis í seinasta lagi fýra vikur, áðrenn hon verður latin úr hondum uttan so, at brævaskifti áður hevur verið um málið.

**Stk. 4.** Landsgrannskoðarin letur løgtingsgrannskoðarunum eina ársfrágreiðing um sítt virksemi. Tíðarfreistin fyri hesi frágreiðing verður avtalað við løgtingsgrannskoðararnar.

inden afgivelsen forelægges landsstyret, medmindre der tidligere har været brevvekslet om den.

**Stk. 4.** Landsrevisor afgiver en årlig beretning til lagtingsrevisorerne om sin virksomhed. Tidspunktet for afgivelsen aftales med lagtingsrevisorerne.

**§ 19.**

Løgtingsgrannskoðararnir senda løgtinginum og landsstýrinum tær frágreiðingar, ið nevndar eru í § 18, saman við møguligum viðmerkingum innan 2 mánaðir eftir, teir hava fingið tær.

**Stk. 2.** Í seinasta lagi fýra mánaðir aftaná, at løgtingsgrannskoðararnir hava latið eina frágreiðing, verður landsstýrið at geva løgtingsgrannskoðarunum eina skrivliga fráboðan um tey tiltøk og tær ætlanir, ið frágreiðingin hevur elvt til. Fráboðanirnar og viðmerkingar landsgrannskoðarans verða at taka við í tað endaliga álitið frá løgtingsgrannskoðarunum til løgtingið.

**§ 19.**

Lagtingsrevisorerne fremsender med deres eventuelle bemærkninger de beretninger, der er nævnt i § 18, til lagtinget og landsstyret inden 2 måneder fra modtagelsen.

**Stk. 2.** Inden fire måneder efter lagtingsrevisorernes fremsendelse af en beretning afgiver landsstyret til lagtingsrevisorerne en redgørelse for de foranstaltninger og overvejelser, som beretningen har givet anledning til. Redegørelserne og landsrevisorens bemærkninger indgår i lagtingsrevisorernes endelige betænkning til lagtinget.

**§ 20.**

Formansskapur Føroya Løgtings ásetir eftir ummæli frá løgtingsgrannskoðarunum almennar reglur fyri landsgrannskoðaran viðvíkjandi fyrisitingarligum viðurskiftum og almennum innliti.

**§ 20.**

Lagtingets præsidium fastsætter efter forelæggelse for lagtingsrevisorerne almindelige bestemmelser for landsrevisor med hensyn til forvaltningsmæssige forhold og offentlighed i forvaltningen.

**§ 21.**

Fyri skjølini hjá landsgrannskoðanini galda reglurnar um viðferð og varðveitslu av almennum skjølum.

**§ 21.**

For Landsrevisionens arkiver gælder reglerne om behandling af den offentlige forvaltnings arkivalier.

**§ 22.**

Henda lóg kemur gildi tann 1. januar 1994. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 16 frá 26. apríl 1965 um grannskoðing av landsins almennu roknskapum.

**Stk. 2.** § 2, stk. 1 er ikki galdandi fyri roknskapir, har serligar reglur fyri grannskoðan longu eru ásettar við lóg.

**Stk. 3.** Áðrenn 1. januar 1994 verður formansskapur Føroya Løgtings at góðkenna verandi grannskoðanarskipanir smb. § 3, stk. 1, og landsstýrið verður innan sama dag at áseta nærri reglur hesum viðvíkjandi smb. § 3, stk. 2.

**§ 22.**

Loven træder i kraft den 1. januar 1994. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 16 fra 26. april 1965 om revision af landets offentlige regnskaber.

**Stk. 2.** § 2, stk. 1, gælder ikke for regnskaber, for hvis revision der ved allerede gældende lov er fastsat særlige bestemmelser.

**Stk. 3.** Inden den 1. januar 1994 skal lagtingets præsidium have godkendt nuværende revisionsordninger, jfr. § 3, stk. 1, og landsstyret skal inden samme dato have fastsat nærmere bestemmelser vedrørende disse, jfr. § 3, stk. 2.

## Viðmerkingar til lógaruppskotið

### Almennar viðmerkingar:

Endamálið við hesum lógaruppskoti er at áseta nærri reglur fyri roknskapargrannskoðanina, sum m.a. er grundarlagið og støðið undir virki løgtingsgrannskoðaranna.

Í verandi lóg um løgtingsgrannskoðararnar (løgtingslóg nr. 16 frá 26. apríl 1965 um grannskoðing av landsins almennu roknskapum) er ásett í grein 4, at løgtingsgrannskoðararnir hava rætt til at taka váttanir og tílíkt frá roknskapargrannskoðanini sum nóg gott prógv, og í grein 8 er ásett, at fíggjarnevndin stílar fyri roknskapargrannskoðanini.

Í 50-unum og byrjanini av 60-unum var tað løgtingsgrannskoðanardeild, sum í samarbeiði við eitt danskt ríkisviðurkent grannskoðanarvirki hevði roknskapargrannskoðanina um hendi.

Frá 1964 varð øll roknskapargrannskoðanin yvirtikin av einum ríkisviðurkendum grannskoðara í Føroyum.

Sambært fylgiskjølini til fíggjarløgtingslógina 1964/65, var grannskoðaradeild løgtingsins "sambært samtykt fíggjarnevndarinnar upphevað frá 1. apríl 1964 og samstundis yvirtekur statsaut. revisor Jógvan Sundstein revisiónina av roknskapum landsins."

Í 1976 verður ein almenn grannskoðanardeild aftur sett á stovn við støði í einari reglugerð frá landsstýrinum, har ásett verður, at interna grannskoðanardeild

landskassans skal vera undir eftirliti av løgtingsins statsautoriserða grannskoðara.

Sambært reglugerðina frá landsstýrinum er arbeiðsøkið hjá Grannskoðanardeildini avmarkað til ta landskassabókføring, sum verður førd og umsiting av Føroya Gjaldstovu, meðan teir stovnar, sum hava sjálvstøðuga bókføring og roknskap, ikki koma undir grannskoðan av grannskoðanardeildini. Flestu av hesum roknskapum verða grannskoðaðir av eksternum grannskoðarum í dag.

Í verandi lóg um løgtingsgrannskoðaramar, grein 3, 2. stk. skulu løgtingsgrannskoðaramir "hava eyguni eftir, at tað hevur verið forsvarliga húsað í fyrisitingini av midlum landsins og virkjum tess."

Hesin partur av grannskoðanini verður vanliga nevndur "fyrisitingargrannskoðan" (forvaltningsrevision), og er ein týðandi partur av tí hugtaki, ið rópt verður "góður almennur grannskoðanarsiður."

Fyrisitingargrannskoðan hevur m.a. til endamáls at meta um, í hvønn mun ein stovnur ella partur av fyrisitingini á ávísum økjum ella sum heild hevur loyst sínar uppgávur á ein sparnan og hóskandi hátt, og um úrslitini svara til endamálið og fortreytirnar fyri játtanini á fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg.

Í samband við fyrisitingargrannskoðan verða vanliga hugtøkini sparsemi, produktivitetur og effektivitetur havd í huga.

Í einum privatum felag ella virki kunnu eigarar meta um raksturin út frá tí fíggjarliga úrslitinum, ið rakstrarroknskapurin vísir.

Eftirsum flestu almennu stovnar ikki hava til endmáls at geva størst møguligt yvirskot, men skulu loysa bundnar uppgávur, hevur løgtingið tørv á at meta um raksturin á ein annan hátt. Tað er í hesum sambandi, at omanfyrinevnda fyrisitingargrannskoðan hevur stóran týdning.

Reglugerð landsstýrisins frá 1976 fyri internu grannskoðanardeild landskassans ásetir ikki fyrisitingargrannskoðan/grannskoðan eftir góðum almennum grannskoðanarsiði. Í reglugerðini stendur "Grannskoðanin skal fara fram eftir treytunum fyri góðan grannskoðanarsið."

Fyri ta privatu grannskoðanina av almennum stovnum annars eru heldur ikki fyriskipaðar serligar grannskoðanarreglur, og tað er ikki ásett, at grannskoðanin skal fara fram eftir góðum almennum grannskoðanarsiði og privatu grannskoðararnir hava ynskt nærri reglur hesum viðvíkjandi.

Bert tá talan er um grannskoðan av tí partinum av teimum sosialu útreiðslunum, har talan er um ríkisendurgjald, er ásett, at grannskoðanin skal fara fram eftir góðum almennum grannskoðanarsiði, sambært avtaluna í millum fíggjarnevndina og "Socialministeriet" í Danmark, sum varð gjørd í oktober mánaði 1991.

Sum nevnt í áliti í løgtingsmáli nr. 103/7 1991 um grannskoðan av almennum roknskapum, dagfest 9. apríl 1992, meta løgtingsgrannskoðararnir tað verða sera óheppið, at teir sum grundarlag fyri virki teirra mega byggja á eina roknskapar-

grannskoðan, har tað ikki í øllum førum er ásett grannskoðanarkrøv, ið svara til tað støðið, tey krøv og ta ábyrgd, ið er áløgd løgtingsgrannskoðarunum mótvegis løgtinginum sambært lógini, sum teir virka eftir.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt hesi viðurskifti og hevur í brævi dagfest 4. februar 1992 sent soljóðandi skriv til løgtingsgrannskoðararnar:

"Fíggjarnevnd løgtingsins hevur viðgjørt skriv við ávísum tilfari frá grannskoðanardeild landskassans, dagfest 21. november 1991, har mælt verður til, at grannskoðanin av tí almenna virkseminum eigur at verða umskipað sum skjótast.

Fíggjarnevndin hevur samtykt at heita á løgtingsgrannskoðararnar um at viðgera alt málið sum skjótast, og innan 15. mars 1992 at lata álitið til formansskap løgtingsins."

Í omanfyri nevnda skrivi frá Grannskoðanardeild Landskassans verður gjørt vart við, at tað í tí dagliga er ivi um fleiri grundleggjandi viðurskifti so sum:

- krøv til grannskoðanina
- heimildir
- arbeiðsøki og uppgávur
- ábyrgd og skyldur
- tíðarfreistir
- rapportering
- samskifti og samstarv við:
  - løgtingsgrannskoðararnar
  - ta eksternu grannskoðanina
  - landsstýrið
  - løgtingið/fíggjarnevndina.

Endamálið við hesum lógaruppskoti er sostatt at bøta um omanfyrinevndu ógreiðu viðurskifti viðvíkjandi grannskoðanini av tí almenna virkseminum og leggja fastari karmar um virki løgtingsgrannskoðaranna.

Eftir sum lógin um løgtingsgrannskoðararnar er gjørd við tí tilsvarandi donsku lógini sum fyrimynd, verður mett rættast, at lógin um grannskoðan av landsins almennu roknskapum eisini verður gjørd við tí tilsvarandi donsku lógini sum fyrimynd, við neyðugum tillagingum til føroysk viðurskifti.

Í hesum sambandi kann nevnast, at løgtingsgrannskoðararnir, umboð fyri løgtingið, fíggjarnevndina, landsstýrið, Grannskoðanardeild landskassans og løgtingsins statsautoriserøða grannskoðara tann 25. juni 1992 høvdu kunnandi fund við umboð frá tí donsku ríkisgrannskoðanini, ið vóru stødd í Føroyum, til tess at kunna seg nærri um ta donsku grannskoðanarskipanina.

Lógaruppskotið er í høvuðsheitum í tráð við ta tilsvarandi donsku ríkisgrannskoðaralógina (lov om revison af statens regnskaber m.m.) sum ásett í "bekendtgørelse nr. 489 af 24. juni 1991".

**Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:**

**Grein 1.**
Sambært grein 1 verður landsgrannskoðanin formliga løgd undir løgtingið. Formansskapur Føroya Løgtings skal seta og loysa úr starvi ein landsgrannskoðara eftir tilmæli frá løgtingsgrannskoðarunum.

Ásett verður, at landsgrannskoðarin er óheftur í virki sínum.

Eftir uppskotinum verða fíggjarviðurskifti stovnsins løgd beinleiðis undir løgtingið. Fíggjarætlan stovnsins verður við viðmerkingum løgtingsgrannskoðaranna send Formansskapi Føroya Løgtings, ið viðger uppskotið saman við fíggjarætlan løgtingsins.

Viðvíkjandi grannskoðan verður ásett, at roknskapurin hjá landsgrannskoðanini verður grannskoðaður saman við roknskapi løgtingsins.

**Grein 2.**
§ 2, stk. 1, nr. 1 fevnir um alla landsumsitingina, landsstovnar v.m. t.v.s. allar stovnar v.m. sum landið eigur.

§ 2, stk. 1, nr. 2 fevnir um sjálvsognarstovnar, feløg, grunnar v.m., sum landið ikki eigur, men hvørs útreiðslur ella rakstrarhall í fullan mun verða goldnar av landinum. Talan kann vera um, at fíggjarætlanin hjá viðkomandi stovni v.m. er við á játtanarlóg, at studningurin verður veittur beinleiðis ella óbeinleiðis við at útreiðslur ella rakstrarhall verða goldin við lógásettum gjøldum, ella aðrari inntøku samb. lóg.

**Grein 3.**
Ein stórur partur av teimum almennu roknskapunum verða grannskoðaðir av privatum grannskoðanarvirkjum, men í flest øllum førum eru ongar serligar reglur ásettar viðvíkjandi endamáli og innihaldi av hesi grannskoðan.

Í stk. 2 er ásett, at landsstýrið í teimum førum, formansskapur Føroya Løgtings samb. § 3, stk. 1 hevur góðkent eina serstaka grannskoðanarskipan, skal áseta nærri reglur (instruksir) fyri grannskoðanina, í tráð við § 4 í hesi lóg, til tess at tryggja, at grannskoðanin verður á sama støði, óansað um grannskoðanin av stovnum v.m. verður útint av einum privatum grannskoðara ella av landsgrannskoðanini.

Endamálið við lógaruppskotinum er ikki at broyta lutfallið millum ta privatu og almennu grannskoðanina, men at tryggja eina einsháttaða grannskoðan eftir

góðum almennum grannskoðanarsiði, og at fáa formaliserað alla grannskoðanina innan tað almenna.

Skotið verður tí upp sambært § 22, 3. stk., at Formansskapur Føroya Løgtings áðrenn 1. januar 1994 skal hava gjøgnumgingið og góðkent verandi grannskoðanarskipanir, og at landsstýrið áðrenn sama dag skal hava ásett nærri reglur sum omanfyri tilskilað.

**Grein 4.**

Innihaldið í grein 4 er ein nýskipan viðvíkjandi roknskapargrannskoðanini, við tað at grannskoðanin umframt vanliga fíggjargrannskoðan eisini skal fevna um fyrisitingargrannskoðan, ella við øðrum orðum, at grannskoðanin skal fara fram eftir góðum almennum grannskoðanarsiði, sum nærri greitt frá í teim almennu viðmerkingunum.

**Grannskoðanin skal ansa eftir:**

**a.** at roknskapurin er rætt uppsettur viðvíkjandi upphæddum og samsvarandi bókhaldinum og at bæði inntøkur og útreiðslur eru hóskandi skjalprógvaðar,
**b.** at hvør roknskaparpostur er í tráð við galdandi lógir, kunngerðir, fyriskipanir og verandi avtalur,
**c.** at eingin útreiðsla er hildin uttan heimild á fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg, at játtanirnar eru nýttar í tráð við orð og fyritreytir, og at allar útreiðslur og inntøkur eru bólkaðar á rættan hátt, og at ongar flytingar eru gjørdar frá einum fíggjarári til annað uttan heimild,
**d.** at tað í fyrisitingini av landsins peningi og viðvíkjandi rakstri av teimum virkjum roknskapirnir fevna um er sýnt neyðugt fíggjarligt umhugsni.

**ad. a.**

Her verður hugsað um at ansa eftir, at skjøl eru váttað, konterað og bókað í tráð við galdani reglur, men vaksandi skjalamongd v.m. hevur gjørt tað neyðugt at grannskoðanin í størri mun má leggja dent á at meta um, um fyrisitingin hevur fyriskipað eina virkna og trygga mannagongd á teim ymisku økjunum, og er hetta eisini galdandi í sambandi við ta vaksandi edv-nýtsluna.

**ad. b.**

Hesin parturin av grannskoðanini verður vanliga nevndur "løgfrøðislig-kritisk" grannskoðan, og fevnir um eftirkannan av, um ávísar fyrisitingarreglur verða fylgdar og eisini um útreiðslur t.d. innan almannaøkið, fiskivinnuna og skúlaøkið o.s.fr. eru hildnar í tráð við lógir, kunngerðir, reglugerðir v.m., og um inntøkur verða útroknaðar í trá við skatta-, toll- og aðrar lógir v.m.

**ad. c.**
Ábyrgdin av játtanareftirliti áliggur serliga løgtingsgrannskoðarunum, men í arbeiði sínum hesum viðvíkjandi, verða teir eisini at byggja á tær frágreiðingar frá landsstýrinum um frávik millum játtanar- og roknskapartøl smb. § 12, 2. stk. og á ta serligu frágreiðingina hesum viðvíkjandi frá landsgrannskoðanini smb. § 18, 1. stk.

**ad. d.**
Her er talan um tann "fíggjarliga kritiska" partin av grannskoðanini (fyrisitingargrannskoðan). Landsins peningur skal fyrisitast best møguligt, soleiðis at uppgávurnar í landsumsitingini og á almennu stovnunum verða loystar best møguligt í tráð við tað endamál, teimum er álagt, innan verandi fíggjarkarmar, og at tær inntøkur, ið heimild er at uppkrevja, verða innkravdar best gjørligt.

**Grein 5.**
Meðan § 2 fevnir um teir stovnar v.m., hvørs rakstur sum heild verður fíggjaður av landinum, ella við inntøkum sambært lóg, fevnir § 5, nr. 1 um stovnar v.m, har leikluturin hjá landinum er avmarkaður til stuðul av ymsum slag, ella har inntøkur, sum stovnarnir v.m. fáa sambært lóg, ikki kunnu fíggja allan raksturin.

Grannskoðanin av stovnum v.m. smb. § 2 verður at úlinna av landsgrannskoðanini, sjá tó § 3, meðan roknskapir frá stovnum v.m. smb. § 5 verða grannskoðaðir av øðrum grannskoðarum. Hesir roknskapir kann landsgrannskoðanin frá landsstýrinum krevja at fáa til kanningar, og eigur landsgrannskoðanin við hesari kanning fyrst og fremst at ansa eftir, at teir verða grannskoðaðir á tryggan hátt, og at tær ásettu reglurnar um grannskoðan verða fylgdar.

**Grein 7.**
Her verður nærri lýst, hvussu teir roknskapir, ið nevndir eru í grein 4, skulu kannast. Her verður nevnt, at tað serliga skal kannast, eftir at roknskapirnir verða nóg væl grannskoðaðir, og herundir serliga at fyrisitingargrannskoðan er farin fram.

**Grein 9.**
Her verður ásett, at landsgrannskoðarin skal stuðla løgtingsgrannskoðarunum í virki teirra, og kann geva frágreiðingar um viðurskifti, ið løgtingsgrannskoðararnir ynskja at fáa lýst, og harumframt at hava fund við løgtingsgrannskoðararnar tá ein av pørtunum ynskir tað.

Eisini verður álagt landsgrannskoðanini at stuðla landsstýrinum í sambandi við skipan av roknskaparhaldi og roknskaparligum eftirliti.

**Grein 10 og 11.**
Her verður heimilað og álagt landsgrannskoðanini ein virknan leiklut, har talan verður um møguliga skipan av innanvirkis grannskoðan, og viðvíkjandi broytingum av roknskapar- og øðrum skipanum.

**Grein 12.**
Her verður landsstýrinum álagt at lata landsgrannskoðanini landsroknskapin við frágreiðingum um frávik millum játtanar- og roknskapartøl innan 6 mánaðir aftaná, at fíggjarárið er liðið.

Hetta at landsstýrið skal greiða frá hesum frávikum, og tíðarfreistin er ásett til 6 mánaðir í staðin fyri 8, er ein nýskipan.

**Grein 13 og 14.**
Landsgrannskoðanini verður her heimilað frá einumhvørjum almennum myndugleika at krevja upplýsingar og tilfar, og til eina og hvørja tíð at grannskoða og gjøgnumganga roknskapir á tí staði, har roknskaparhaldið fer fram.

**Grein 16.**
Her verður álagt landsgrannskoðanini at kunna landsstýrið um grannskoðanina og geva fráboðan um viðurskifti av týdningi, ið verða staðfest undir grannskoðanini.

**Grein 17.**
Her verður ásett ein svarskylda viðvíkjandi viðmerkingum frá landsgrannskoðanini við einari freist upp á 6 vikur. Álagt verður at kunna løgtingsgrannskoðaramar um øll óavgreidd mál.

**Grein 18.**
Umframt tær frágreiðingar, ið løgtingsgrannskoðaramir biðja um sambært grein 9, verður álagt landsgrannskoðanini at lata úr hondum trý sløg av frágreiðingum:

1. Frágreiðing um frávik ímillum játtanar- og roknskapartøl.
2. Frágreiðingar um grannskoðanarmál, sum landsgrannskoðanin metir eiga at verða umrødd.
3. Ársfrágreiðing um virksemið hjá landsgrannskoðanini.

Í 3. stk. verður tryggjað, at landsstýrið fær høvi til at ummæla hesar frágreiðingar, áðrenn tær verða sendar løgtingsgrannskoðarunum.

Eins og omanfyri nevnt, leggur lógaruppskotið upp til at tryggja, at tað tilfar, sum verður latið løgtingsgrannskoðarunum verður so objektivt rætt sum gjørligt, og at allir partar fáa høvi at lýsa síni sjónarmið.

**Grein 19.**
Her verða arbeiðsuppgávurnar hjá løgtingsgrannskoðarunum nærri ásettar eins og fráboðanarhátturin til løgtingið og landsstýrið verður nærri lýstur. Grannskoðanarfrágreiðingar og viðmerkingar frá løgtingsgrannskoðarunum verða sendar løgtinginum, so hvørt tær verða gjørdar.

**Grein 21.**
Í lógaruppskotinum um alment innlit, sum væntandi verður lagt fyri tingið í komandi tingsetu, er ásett, at løgtingið, og harvið eisini løgtingsgrannskoðararnir, ikki er umfatað av lógini. Við tað at landsgrannskoðanin er undir løgtinginum, skal serstøk skipan hesum viðvíkjandi ásetast fyri landsgrannskoðanina.

# 176. Grannskoðan av almennum roknskapum

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið samtykkir soljóðandi reglugerð um val og virki løgtingsgrannskoðaranna.

**§ 1.**
Løgtingið velur 4 løgtingsgrannskoðarar og ein tiltaksmann fyri hvønn av hesum. Valið er fyri 4 ár frá 1. januar at rokna.

**2. Stk.** Um ein løgtingsgrannskoðari doyr ella heldur uppat at virka sum løgtingsgrannskoðari í tíðarskeiðnum, hann er valdur, velur løgtingið nýggjan løgtingsgrannskoðara fyri tíðina, sum eftir er av valskeiðnum. Um løgtingsgrannskoðari er sjúkur ella hevur annað forfall í longri tíð, og í teimum førum, tá løgtingið ikki beinavegin kann velja nýggjan løgtingsgrannskoðara fyri annan, kunnu løgtingsgrannskoðararnir á fundi avgera at boðsenda tiltaksmanninum.

**§ 2.**
Ongin kann vera løgtingsgrannskoðari ella tiltaksmaður uttan at uppfylla treytirnar fyri at kunna veljast í løgtingið. Spurningar hesum viðvíkjandi verða endaliga avgjørdir av løgtinginum.

**2. stk.** Ein løgtingsgrannskoðari kann ikki uttan loyvi frá formansskapi løgtingsins átaka sær nakað starv, ella átaka sær lønt arbeiði í longri tíðarskeið, har heimildin at seta ella loysa úr starvi er hjá einum lands- ella kommunalum myndugleika ella hjá einum landsstuðlaðum virki.

**§ 3.**

Formaður og næstformaður fyri løgtingsgrannskoðaramar eru ávikavist tann fyrst og tann næst valdi.

**2. stk.** Formaðurin ásetir og leiðir fundirnar og hevur ábyrgdina av dagliga virksemi løgtingsgrannskoðaranna. Hevur formaðurin forfall, kemur næstformaðurin i hansara stað.

**§ 4.**

Løgtingsgrannskoðaramir eru viðtøkuførir, tá fundarboð eru givin í rímiligari tíð, og ein meiriluti av løgtingsgrannskoðarunum eru møttir. Atkvøða formansins er avgerandi, tá tað stendur á jøvnum.

**2. stk.** Stuttorðað gerðabók verður ført fyri hvønn fundin. Hvør einstakur løgtingsgrannskoðari kann krevja síni sjónarmið ført í gerðabókina.

**§ 5.**

Saman við møguligum viðmerkingum senda løgtingsgrannskoðaramir løgtinginum tær frágreiðingar, ið nevndar eru í § 18 í lóg um grannskoðan av landsins almennu roknskapum v.m.

**2. stk.** Áðrenn frágreiðing verður givin løgtinginum, kunnu løgtingsgrannskoðaramir biðja landsgrannskoðaran, landsstýrið og aðrar landsmyndugleikar um at útvega fleiri upplýsingar viðvíkjandi málum, sum eru umrødd í frágreiðingini.

**3. stk.** Tá løgtingsgrannskoðaramir gera viðmerkingar sínar og nærri kanningar eiga tær serliga at kanna eftir og meta um, um løgtingið og løgtingsnevndir hava fingið neyðugar og rættar upplýsingar í samband við givnar játtanir og aðrar avgerðir.

**§ 6.**

Løgtingsgrannskoðaramir kunnu eisini lata løgtinginum frágreiðingar, sum teir hava heitt á landsgrannskoðaran um at gera smb. § 9 í lóg um grannskoðan av landsins almennu roknskapum v.m., ella sum landsgrannskoðarin hevur lagt smb. § 17 í somu lóg. Slíkar frágreiðingar verða at senda landsstýrinum samstundis, sum tær verða latnar løgtinginum.

§ 7.

Løgtingsgrannskoðararnir lata løgtinginum eitt endaligt álit um landsroknskapin í seinasta lagi 16 mánaðir aftaná, at landsroknskapurin er latin løgtinginum.

**2. stk.** Í álitinum verða tiknar við fráboðanir frá landsstýrinum og viðmerkingar frá landsgrannskoðaranum smb. § 19, 2. stk. í lóg um grannskoðan av landsins roknskapum v.m.

**3. stk.** Løgtingsgrannskoðararnir royna best gjørligt at greiða umrødd mál og at greiða frá sínari støðu, áðrenn tað endaliga álitið verður latið løgtinginum. Halda løgtingsgrannskoðararnir, at eitt mál krevur serstaka samtykt í løgtinginum, verður tilmæli hesum viðvíkjandi latið saman við viðmerkingunum í málinum.

§ 8.

Einhvør løgtingsgrannskoðari hevur rætt til at krevja síni sjónarmið tikin við og grundgivin í hvørjum einstøkum máli í frágreiðingum og álitum.

§ 9.

Um ein løgtingsnevnd vil hava stuðul frá løgtingsgrannskoðarunum til at útvega sær grannskoðanarligar upplýsingar, verður umbøn hesum viðvíkjandi at senda løgtingsgrannskoðarunum skrivliga. Umbønin verur at viðgera skjótast gjørligt á fundi hjá løgtingsgrannskoðarunum.

**2. stk.** Halda løgtingsgrannskoðararnir, at tær umbidnu upplýsingarnar ikki eru grannskoðanarligar, ella at umbønin av øðrum orsøkum ikki kann gangast á møti, verður sagt løgtingsnevndini frá hesum skrivliga við hóskandi grundgeving.

**3. stk.** Bæði løgtingsgrannskoðararnir og løgtingsnevndin kunnu krevja fund hildnan í teimum førum, sum nevnd eru í 2. stk.

§ 10.

Frágreiðingar frá landsgrannskoðaranum, sum løgtingsgrannskoðararnir hava biðið um eftir reglunum í § 9, sjá § 9 í lóg um grannskoðan av landsins almennu roknskapum v.m., verða beinanvegin at senda víðari til viðkomandi løgtingsnevnd. Innan 2 vikur aftaná, at nevndin hevur fingið frágreiðingina, boðar hon løgtingsgrannskoðarunum frá, um hon letur alla frágreiðingina fylgja við nevndarálitinum ella prenta sum fylgiskjal. Ger hon ikki tað, kunnu løgtingsgrannskoðararnir avgera at lata løgtinginum frágreiðingina.

**2. stk.** Tekur løgtingsnevndin alla frágreiðingina við í álíti sínum, skulu møguligar viðmerkingar frá løgtingsgrannskoðarunum eisini takast við.

**3. stk.** Løgtingsgrannskoðararnir og viðkomandi løgtingsnevnd kunnu biðja um fund um frágreiðingarnar og biðja um, at landsgrannskoðarin kemur saman við løgtingsgrannskoðarunum á tílíkar fundir.

**§ 11.**

Løgtingsgrannskoðaramir fáa eina fasta árliga samsýning upp á xxxxx kr.

**2. stk.** Samsýningin smb. 1 stk. verður goldin við 1 1/2 frammanundan frá tí degi, valskeiðið byrjar til endan í tí mánaði, viðkomandi heldur uppat at vera løgtingsgrannskoðari. Við val smb. § 1, 2. stk. verður valskeiðsskeiðið roknað frá tí degi valið fer fram, uttan so at løgtingið í hvørjum einstøkum føri tekur aðra avgerð.

**3. stk.** Tiltaksmaður, sum verður boðsendur, fær løn sum løgtingsgrannskoðari frá tí degi, løgtingsgrannskoðaramir boðsenda honum, til endan í tí mánaði, tá løgtingsgrannskoðararnir avgera, at hann ikki skal møta longur, ella tá val verður smb. § 1, 2. stk.

**§ 17.**

Løgtingsgrannskoðaramir seta og loysa úr starvi skrivara og møguliga aðra skrivstovuhjálp.

**§ 18.**

Tá løgtingsgrannskoðararnir hava samtykt uppskot sítt til fíggjarætlan, sendir formaðurin uppskotið til løgtingsformannin, sum sær til, at tað verður viðgjørt saman við fíggjarætlan løgtingsins. Roknskapurin hjá løgtingsgrannskoðarunum verður tikin við í roknskapi løgtingsins.

**§ 19.**

Henda løgtingssamtykt kemur í gildi samstundis sum lógin um løgtingsgrannskoðaramar.

**2. stk.** Samstundis fer úr gildi reglugerð fyri løgtingsgrannskoðaramar, samtykt 27. mars 1985.

# 177. Stuðul til bygging av fiskiførum á føroyskum skipasmiðjum til útflutnings

**Uppskot**

**til**

*broyting í løgtingslóg um stuðul til bygging av fiskiførum á føroyskum skipasmiðjum til útflutnings.*

*ændring i lagtingslov om støtte til bygning af fiskeskibe på færøske skibsværfter til eksport.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 38 frá 20. mai 1988 um stuðul til bygging av fiskiførum á føroyskum skipasmiðjum til útflutnings verða gjørdar hesar broytingar:

**§1.**

I lagtingslov nr. 38 af 20. maj 1988 om støtte til bygning af fiskeskibe på færøske skibsværfter til eksport foretages følgende ændringer:

1) Í § 3 verður sum nýtt stk. 2 sett:
"Stk. 2. Til fulla ella partvísa endurrinding av farmagjaldsútreiðslum av tilfari til umbygging av fiskifari í Føroyum, kann studningur veitast við upp til 4,5% av umbyggingarvirðinum, tá umbyggingin verður 3 mió. kr. ella meira."

1) I § 3 sættes som stk. 2:
"Stk. 2. Til fuld eller delvis dækning af udgifter ved fragtafgift på materiale til ombygning af fiskeskibe på Færøerne, kan støtte optil 4,5% af ombygningssummen gives, når ombygningen koster 3 mio. kr. eller mere."

2) Í § 4 verður sum nýtt stk. 2 sett:
"Stk. 2. Til fulla ella partvísa endurrinding av serliga innflutningsgjaldinum av tilfari til umbygging av fiskifari í Føroyum, kann skipasmiðjan fáa í studningi upp til 13% av umbyggingarkostnaðinum eftir meting, um umbyggingarkostnaðurin verður 3 mió. kr. ella meira."

2) § 4, stk. 2 affattes således:
"Stk. 2. Til fuld eller delvis dækning af den særlige indførselsafgift af materiale til ombygning af fiskeskibe på Færøerne, kan skibsværftet få et tilskud på optil 13% af ombygningssummen, i henhold til vurderingen, om ombygningsudgiften bliver 3 mio. kr. eller mere."

3) Stk. 2 í § 4 verður hereftir stk. 3.

3) Stk. 2 i § 4 bliver herefter stk. 3.

4) Í § 5 verður sum nýtt stk. 2 sett:
"Stk. 2. Landsstýrinum verður heimilað eftir góðkenning fíggjarnevndarinnar at veita upp til 6% í rentustudningi til felag, ið umbyggir fiskiskip á føroyskum skipasmiðjum. Studningurin verður veittur av umbyggingarvirðinum eftir meting. Studningurin er treytaður av, at virðið, ið umbyggingin gevur, verður 8 mió. kr. ella meira."

5) Stk. 2 í § 5 verður hereftir stk. 3.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er lýst.

4) I § 5 sættes som nyt stk. 2:
"Stk. 2. Landsstyret bemyndiges til efter godkendelse fra finansudvalget at give op til 6% i rentesubsidium til selskaber, der ombygger fiskeskibe på færøske skibsværfter. Subsidier gives af ombygningssummen i henhold til vurdering. Støtten er under forudsætning af, at værdien af ombygningen er 8 mio. kr. eller mere."

5) Stk. 2 i § 5 bliver herefter stk. 3.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

**Viðmerkingar:**

Víst verður til løgtingslóg nr. 48 frá 8. juni 1991, løgtingsmál nr. 79/1990: Vetrarting.

Sambært løgtingslóg nr. 102 frá 19. august 1988 um endurnýgging av fiskiskipaflotanum er heimild at veita stuðul til bygging og umbygging av føroyskum fiskiskipum, og sambært løgtingslóg nr. 38 frá 20. mai 1988 er heimild at veita stuðul til nýbygging av fiskiførum á føroyskum skipasmiðjum til útflutnings.

Lógin nr. 48 varð løgd fram eftir ynski frá føroysku skipasmiðjunum, men varð hon tíðaravmarkað til 31. desember 1992.

Skipasmiðjurnar arbeiða við ymiskum verkætlanum og ynskja, at lógin verður sett aftur í gildi. Sjálvt um einki skip hevur fingið stuðul sambært lógini, heldur landsstýrið tað vera rætt at seta lógina í gildi.

# 178. Stuðul til bygging av farmaskipum

**Uppskot**

**til**

*broyting í løgtingslóg um stuðul til bygging av farmaskipum.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 83 frá 19. juni 1990 um stuðul til bygging av farmaskipum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 2 verður sum nýtt stk. 2 sett:
"Stk. 2. Til fulla ella partvísa endurrinding av farmagjaldsútreiðslum fyri tilfar til umbygging av farmaskipum á føroyskum skipasmiðjum, kann studningur veitast við upp til 4,50% av umbyggingarvirðinum eftir meting, tá umbyggingin er 3 mió. kr. ella meira."

2) Í § 3 verður sum nýtt stk. 2 sett:
"Stk. 2. Til fulla ella partvísa endurrinding av tilfari til umbygging av farmaskipum á føroyskum skipasmiðjum, kann skipasmiðjan fáa í studningi upp til 13% av umbyggingarvirðinum eftir meting, tá umbyggingin er 3 mió. kr. ella meira.

3) Í § 4 verður sum nýtt stk. 2 sett:
"Stk. 2. Heimilað verður landsstýrinum at veita upp til 6% í studningi til felag, ið umbyggir farmaskip á føroyskari skipasmiðju.

*ændring i lagtingslov om støtte til bygning af fragtskibe.*

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 83 fra 19. juni 1990 om støtte til bygning af fragtskibe foretages følgende ændringer:

1) I § 2, sættes som stk. 2:
"Stk. 2. Til fuld eller delvis dækning af fragtudgifter for materiale til fragtskibe, bygget på færøske værfter, kan der ydes tilskud på indtil 4,50% af ombygningsværdien i henhold til vurderingen, når ombygningen koster 3 mio. kr. eller mere."

2) I § 3 sættes som stk. 2:
"Stk. 2. Til fuld eller delvis refusion af materiale til ombygning af fragtskibe på færøske værfter, kan der til værftet ydes tilskud på indtil 13% af ombygningssummen i henhold til vurdering, når ombygningen koster 3 mio. kr. eller mere."

3) I § 4 sættes som stk. 2:
"Stk. 2. Landsstyret bemyndiges til at yde tilskud indtil 6% i støtte til selskab, som ombygger fragtskib på færøsk skibsværft. Støtten

Studningurin verður roknaður av umbyggingarvirðinum eftir meting, treytað av, at virðið av umbyggingini verður 8 mió. kr. ella meira."

beregnes af ombygningssummen i henhold til vurdering under forudsætning af, at værdien af ombygningen er 8 mio. kr. eller mere."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

**Viðmerkingar:**

Víst verður til løgtingslóg nr. 46 frá 8. mai 1991, løgtingsmál nr. 78/1990 Vetrarting.

Sambært løgtingslóg nr. 83 frá 19. juni 1990 um stuðul til bygging av farmaskipum er heimild til at veita stuðul til nýbygging av farmaskipum á føroyskum skipasmiðjum.

Skipasmiðjur í Føroyum høvdu fingið fyrispurningar um umbygging av fremmandum farmaskipum og fiskiskipum til "supply"-skip og meinti landsstýrið, at tað var rætt at gera eina roynd.

Løgtingslóg nr. 46 fór úr gildi 31. desember 1992, men arbeiða skipasmiðjur við at fáa sáttmálar og ynskja lógina setta aftur í gildi.

Sjálvt um bert eitt skip fekk stuðul eftir nevndu lóg, heldur landsstýrið tað vera rætt at seta lógina í gildi aftur.

# 179. Løgtingslóg um hægri tøkniliga útbúgving

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um hægri tøkniliga útbúgving.*

*lagtingslov om højere teknisk uddannelse.*

## Kapittul 1
## Stevnumið

### § 1.

Landsstýrinum verður sbrt. § 2 í lóg nr. 54 frá 14. februar 1979 "for Færøerne om handelsskoler, tekniske skoler samt maskinmester- og maskinistskoler" heimilað at skipa fyri hægri tøkniligari útbúgving.

**Stk. 2.** Útbúgvingin verður skipað soleiðis, at hon veitir gymnasialt, tøkniligt støði undir framhaldandi og hægri útbúgving og er við til at menna næmingarnar persónliga og geva teimum fatan av samfelagnum og menning tess við serligum denti á viðurskifti vinnulívsins.

## Kapitel 1
## Formål

### § 1.

Landsstyret har i henhold til § 2 i rammelov nr. 54 af 14. februar 1979 for Færøerne om handelsskoler, tekniske skoler samt maskinmester- og maskinistskoler fået hjemmel til at forestå højere teknisk uddannelse.

**Stk. 2.** Uddannelsen tilrettelægges således, at den giver et gymnasialt, teknisk grundlag for videregående og højere uddannelse og bidrager til elevernes personlige udvikling og til deres forståelse af samfundet og dets udvikling med særlig vægt på erhvervslivets forhold.

### § 2.

Útbúgvingin verður skipað sum 2 ára skúlaundirvísing.

**Stk. 2.** Útbúgvingin fer fram á skúlum, sum eru góðkendir av landsstýrinum til hetta endamálið.

**Stk. 3.** Landsstýrið ásetir gjøllari reglur um útbúgvingina.

### § 2.

Uddannelsen tilrettelægges som 2-årig skoleundervisning.

**Stk. 2.** Uddannelsen foregår på skoler, der er godkendt af landsstyret til dette formål.

**Stk. 3.** Landsstyret fastsætter nærmere regler for uddannelsen.

§ 3.

Skipað kann verða fyri stakgreinaundirvísing ella fyri serliga skipaðari undirvísingargongd til tess at veita tilkomnum:

a) grundarlag fyri framhaldandi og hægri útbúgving,
b) ískoyti til eina frammanundan lokna útbúgving ella
c) hóskandi førleika fyri starvi í vinnulívinum.

**Stk. 2.** Stakgreinaundirvísing kann samansetast til eina útbúgving av pørtum av fleiri gymnasialum útbúgvingum. Landsstýrið ásetir gjøllari reglur um hetta.

§ 3.

Der kan etableres enkeltfagsundervisning eller særligt tilrettelagt undervisningsforløb med henblik på at give voksne:

a) grundlag for videregående og højere uddannelse,
b) tillæg til en i forvejen afsluttet uddannelse eller
c) egnede kvalifikationer til beskæftigelse i erhvervslivet.

**Stk. 2.** Enkeltfagsundervisning kan sammensættes til én uddannelse af dele fra flere gymnasiale uddannelser. Landsstyret fastsætter nærmere regler herom.

## Kapittul 2
## Atgongd til útbúgvingina

§ 4.

Tann, sum verður tikin upp til útbúgvingina, skal hava tikið 1. og 2. eindina í støðisútbúgvingini innan tøkni, sbr. løgtingslóg nr. 47 frá 28. apríl 1992 um støðisútbúgving innan tøkni.

**Stk. 2.** Umsøkjari, sum longu hevur nomið tilsvarandi kunnleika í skúla ella í starvi, kann sleppa undan kravdu støðisútbúgvingini ella pørtum av henni. Landsstýrið ásetir gjøllari reglur um hetta.

**Stk. 3.** Upptøkan er harumframt treytað av, at skúlin, við støði í úrslitinum frá støðisútbúgvingini, sbr. stk. 1, ella tí kunnleika, umsøkjarin longu hevur nomið, sbr. stk. 2, metir, at umsøkjarin kann fullføra útbúgvingina í vanligu tíðini, og at pláss er í skúlanum.

## Kapitel 2
## Adgang til uddannelsen

§ 4.

Den, der optages til uddannelsen, skal have gennemført 1. og 2. modul af den tekniske grunduddannelse, jfr. lagtingslov nr. 47 af 28. april 1992 om teknisk grunduddannelse.

**Stk. 2.** Ansøger, der allerede har fået erhvervet tilsvarende kundskaber i skole eller arbejde, kan fritages for den krævede grunduddannelse eller dele deraf. Landsstyret fastsætter nærmere regler herom.

**Stk. 3.** Optagelsen er desuden betinget af, at skolen, ud fra resultatet fra grunduddannelsen, jfr., stk. 1, eller de kundskaber, eleven allerede har fået, jfr. stk. 2, vurderer, at eleven kan gennemføre uddannelsen på normal tid, og at der er plads på skolen.

§ 5.

Landsstýrið kann í serligum føri áleggja einum skúla at seta útbúgvingina á stovn ella at taka ávíst tal av næmingum.

## Kapittul 3
## Innihaldið í útbúgvingini

§ 6.

Í útbúgvingini eru lærugreinir úr einari gymnasialari, tøkniligari lærugreinarøð, sum landsstýrið ásetir gjøllari reglur um, umframt møguligar lærugreinir øðrum gymnasialum útbúgvingum.

**Stk. 2.** Í útbúgvingini eru umleið tveir triðingar av undirvísingini kravdar lærugreinir og ein triðingur vallærugreinir.

**Stk. 3.** Meginparturin av teimum kravdu lærugreinunum verða skipaðar í stigum. Næmingur skal í minsta lagi velja tvær lærugreinir á hástigi.

§ 7.

Tær kravdu lærugreinirnar verða skipaðar samsvarandi teirri í § 6 nevndu lærugreinarøð, meðan vallærugreinirnar eru:

a) lærugreinir, sum byggja á tær kravdu lærugreinirnar,
b) aðrar lærugreinir úr lærugreinarøðini og
c) lærugreinir, ið annars nøkta áhugamál og tørv næminganna.

**Stk. 2.** Næmingar kunnu velja lærugreinir á øðrum gymnasialum undirvísingarstovnum, um tær verða skipaðar samsvarandi stk. 1.

§ 5.

Landsstyret kan i særlige tilfælde pålægge en skole at etablere uddannelsen eller at optage et bestemt antal elever.

## Kapitel 3
## Indholdet af uddannelsen

§ 6.

Uddannelsen sammensættes af fag fra en gymnasial, teknisk fagrække, som landsstyret fastsætter nærmere regler om, foruden eventuelle fag fra andre gymnasiale uddannelser.

**Stk. 2.** Uddannelsen sammensættes af ca. to tredjedele obligatoriske fag og en tredjedel valgfag.

**Stk. 3.** Hovedparten af de obligatoriske fag tilrettelægges i niveauer. Eleven skal vælge mindst to fag på højt niveau.

§ 7.

De obligatoriske fag tilrettelægges i overensstemmelse med den i § 6 nævnte fagrække, mens valgfagene er:

a) fag, der er overbygningsfag på obligatoriske fag,
b) andre fag fra fagrækken og
c) fag, som i øvrigt tilgodeser elevernes interesser og behov.

**Stk. 2.** Eleverne kan vælge fag fra andre gymnasiale uddannelser, såfremt disse tilrettelægges i henhold til stk. 1.

**Stk. 3.** Landsstýrið kann áseta reglur um samanseting av vallærugreinum og kann áleggja einum skúla at bjóða ávísar vallærugreinir.

**§ 8.**

Næmingur, sum hevur tørv á tí, kann fáa serundirvísing ella annan sernámsfrøðiligan stuðul.

**Stk. 2.** Næmingum verða givin ráð og vegleiðing um útbúgvingar- og yrkisviðurskifti.

**Stk. 3.** Landsstýrið ásetir gjøllari reglur um tey í stk. 1 og 2 nevndu viðurskifti.

## Kapittul 4
## Prógtøka

**§ 9.**

Landsstýrið ásetir reglur um prógtøku, herundir reglur um royndir, prógtøkuuppgávur, prógdómarar, prógstig og prógskjøl.

## Kapittul 5
## Aðrar ásetanir og gildiskoma

**§ 10.**

Treytin fyri góðkenning av undirvísingarførleika er, at lærari hevur eina til hesa undirvísing hóskandi útbúgving frá hægri lærustovni.

**Stk. 2.** Í seinasta lagi 2 ár eftir starvssetan, skal lærari hava lokið eina av landsstýrinum góðkenda námsliga roynd. Landsstýrið kann í serligum førum gera undantak frá hesi reglu.

**Stk. 3.** Landsstyret kan fastsætte regler for sammensætning af valgfag og kan pålægge en skole at tilbyde bestemte valgfag.

**§ 8.**

En elev, der har behov herfor, kan få specialundervisning eller anden specialpædagogisk bistand.

**Stk. 2.** Der gives eleverne råd og vejledning i uddannelses- og erhvervsforhold.

**Stk. 3.** Landsstyret fastsætter nærmere regler om de i stk. 1 og 2 nævnte forhold.

## Kapitel 4
## Eksamen

**§ 9.**

Landsstyret fastsætter regler om eksamen, herunder regler om prøver, eksamensopgaver, censorer, karakterer og eksamensbeviser.

## Kapitel 5
## Øvrige bestemmelser og ikrafttræden

**§ 10.**

En betingelse for at opnå godkendelse af undervisningskompetence er, at læreren har en relevant uddannelse fra en højere læreanstalt.

**Stk. 2.** Senest 2 år efter ansættelse skal en lærer have bestået en af landsstyret godkendt pædagogisk prøve. Landsstyret kan i særlige tilfælde gøre undtagelse fra denne bestemmelse.

**Stk. 3.** Landsstýrið ásetir gjøllari reglur um undirvísingarførleika.

**§ 11.**

At tryggja næmingunum framhaldandi og hægri útbúgving í øðrum londum, verður landsstýrið at fáa í lag neyðuga góðkenning av útbúgvingarstøðinum.

**Stk. 2.** Landsstýrið ásetir reglur um samstarv millum skúlar, um upptøku av næmingum og um flokksbýtingartal.

**§ 12.**

Landsskúlaráðið kann víkja frá reglunum í kapitli 3 eitt avmarkað tíðarskeið, í tann mun tað er neyðugt til tess at fremja royndarvirksemi.

**§ 13.**

Undirvísingarútreiðslurnar av útbúgvingini eftir hesi lóg verða rindaðar eftir reglum, sum landsstýrið ásetir.

**Stk. 2.** Landsstýrið kann áseta reglur um næmingagjald fyri stakgreinaundirvísing.

**§ 14.**

Skúlin skal hava næmingarnar tryggjaðar móti skaðum, sum næmingunum kann verða fyri undir skúlagongdini.

**§ 15.**

Henda lóg kemur í gildi 1. august 1993.

**Stk. 3.** Landsstyret fastsætter nærmere regler om undervisningskompetence.

**§ 11.**

For at sikre eleverne videregående og højere uddannelse i andre lande, skal landsstyret tilvejebringe nødvendig godkendelse af uddannelsesniveauet.

**Stk. 2.** Landsstyret fastsætter regler om samarbejde mellem skoler, om elevoptagelse og om klassekvotient.

**§ 12.**

Landsskolerådet kan fravige reglerne i kapitel 3 i et begrænset tidsrum, i det omfang det er nødvendigt for at fremme forsøgsvirksomhed.

**§ 13.**

Undervisningsudgifterne til uddannelsen efter denne lov afholdes efter regler, som landsstyret fastsætter.

**Stk. 2.** Landsstyret kan fastsætte regler om elevbetaling for enkeltfagsundervisning.

**§ 14.**

Skolen har pligt til at have eleverne forsikret mod skader, der kan forekomme under skolegangen.

**§ 15.**

Loven træder i kraft 1. august 1993.

**Viðmerkingar:**

Løgtingslóg nr. 47 frá 28. apríl 1992 fevnir um støðisútbúgving innan tøkni og fekk gildi 1. august 1992.

Landsskúlafyrisitingin hevur í desember 1992 latið úr hondum "Álit um útbúgvingarskipan innan tøkniligar útbúgvingar", og landsskúlaráðið hevur á

fundi 24. februar 1993 samtykt at mæla landsstýrinum til at leggja fyri løgtingið uppskot til løgtingslóg um hægri tøkniliga útbúgving, sum er gjørt út frá nevnda áliti.

Vísandi til álitið, sum er hjálagt sum skjal 1, og til tær "Viðmerkingar" til løgtingslógaruppskotið, sum landsskúlafyrisitingin hevur gjørt, og sum eru hjálagdar sum skjal 2, og við teirri upplýsing, at landsstýrið hevur gjørt ávísar smærri broytingar í nevnda løgtingslógaruppskoti, leggur landsstýrið við hesum uppskot til løgtingslóg um hægri tøkniliga útbúgving fyri løgtingið.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 179/1992: Løgtingslóg um hægri tøkniliga útbúgving.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 15. apríl 1993 og eftir 1. viðgerð 21. apríl 1993 beint í mentannar- og skúlanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt lógaruppskotið, sum miðar ímóti at seta á stovn eina hægri tøkniliga útbúgving, sum veitir gymnasialt, tøkniligt støði undir framhaldandi og hægri útbúgving.

Útbúgvingin verður skipað sum tvey ára skúlaundirvísing, og atgongd til hesa útbúgving hevur hvør tann, sum hevur tikið 1. partin og samlaða útbúgvingartíðin 3 ár.

Tað er landsstýrið, sum góðkennir undirvísingarliga innihaldið í útbúgvingini, og hildið verður rímiligt, at lærarar, ið geva frálæru við hesa útbúgving, hava lokið eina av landsstýrinum góðkenda námsliga roynd, so sum uppskotið sigur, meðan tað ikki verður hildið rímiligt, at vikið verður frá hesi reglu.

Meirilutin ( Hergeir Nielsen, Jógvan A. Johannessen, Helena Dam á Neystabø og Terje Davidsen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins við hesum:

## Broytingaruppskoti

## til

## uppskot landsstýrisins

| | |
|---|---|
| § 10, stk. 2, 2. pkt. verður strikað. | § 10, stk. 2, pkt. 2 udgår. |

Minnilutin (Óli Breckmann) tekur undir við málinum, men vísir til viðmerkingarnar um tøkniútbúgvingarnar í løgtingsfíggjarlógini fyri 1993. Skal játtanin halda, er hetta treytað av, at útbúgvingartilboð og næmingabýti skúlanna millum verður framt í tráð við áðurnevndu viðmerkingar.

# 180. Løgtingslóg um tøkniligar yrkisútbúgvingar

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um tøkniligar yrkisútbúgvingar.*

*lagtingslov om tekniske erhvervsuddannelser.*

## Kapittul 1
## Stevnumið o.a.

### § 1.

Landsstýrinum verður sambært § 2 í lóg nr. 54 frá 14. februar 1979 "for Færøerne om handelsskoler, tekniske skoler samt maskinmester- og maskinistskoler" heimilað at skipa fyri tøkniligum yrkisútbúgvingum.

### § 2.

**Útbúgvingarnar skulu miða ímóti:**

1) at menna tann einstaka næmingin og hjálpa viðkomandi til samfelagsliga fatan,
2) at nøkta tørvin hjá vinnuni, tá ið tað ræður um fakligan førleika og almennan kunnleika.
3) at veita næmingunum støði undir framhaldandi úthúgving og at leggja grundarlag undir framtíðar yrki.

### § 3.

Útbúgvingarnar verða skipaðar soleiðis, at næmingurin skiftir millum verkliga læru í vinnuni og undirvísing í skúla.

## Kapitel 1
## Formål m.v.

### § 1.

Landsstyret bemyndiges i henhold til § 2 i lov nr. 54 af 14. februar 1979 for Færøerne om handelsskoler, tekniske skoler samt maskinmester- og maskinistskoler til at forestå tekniske erhvervsuddannelser.

### § 2.

**Uddannelserne har til formål:**

1) at styrke den enkelte elev og hjælpe vedkommende til samfundsmæssig forståelse,
2) at imødekomme erhvervslivets behov for erhvervsfaglige og generelle kvalifikationer.
3) at yde eleverne basis for fortsat uddannelse og at danne grundlag for fremtidigt erhverv.

### § 3.

Uddannelserne skal være således tilrettelagt, at eleverne skifter mellem praktisk oplæring i erhvervslivet og undervisning i skole.

**Stk. 2.** Útbúgvingarnar verða skipaðar sambært § 11.

**§ 4.**

Landsstýrið ásetir, eftir ummæli frá vinnuskúlaráðnum samsvarandi heimildum tess, gjøllari reglur um útbúgvingarnar sum heild og um hvørja útbúgving sær.

**§ 5.**

Eftir ummæli frá vinnuskúlaráðnum setur landsstýrið á stovn, leggur niður og tekur av útbúgvingar.

**Stk. 2.** Landsstýrið kann áseta reglur um flokksbýtingartal, skúlasamstarv og næmingaupptøku.

**Stk. 3.** Skúlaundirvísingin í teimum útbúgvingum, ið settar verða á stovn, fer fram á skúla, sum landsstýrið góðkennir.

**Stk. 2.** Uddannelserne opdeles i henhold til § 11.

**§ 4.**

Landsstyret fastsætter, efter indstilling fra erhvervsuddannelsesrådet i overensstemmelse med dets bemyndigelser, nærmere regler om uddannelserne som helhed og om de enkelte uddannelser, jfr. § 9.

**§ 5.**

Efter indstilling fra erhvervsuddannelsesrådet opretter, nedlægger og ophæver landsstyret uddannelser.

**Stk. 2.** Landsstyret kan fastsætte regler vedrørende klassekvotient, skolesamarbejde og elevoptagelse.

**Stk. 3.** Skoleundervisningen i de uddannelser, der oprettes, foregår på skole, som landsstyret godkender.

## Kapittul 2
## Atgongd til útbúgvingarnar

**§ 6.**

Tann, sum verður tikin upp í skúla til økispartin, smb. § 11, stk. 2., í einari av útbúgvingunum, skal annaðhvørt hava tikið 1. eindina í støðisútbúgvingini innan tøkni ella 1. skeiðið av verkligari læru sambært útbúgvingarsáttmála.

**Stk. 2.** Tann, sum hevur tikið økispartin við ongum útbúgvingarsáttmála, kann bert halda fram við útbúgvingini, tá útbúgvingarsáttmáli er fingin til vega.

## Kapitel 2
## Adgang til uddannelserne

**§ 6.**

Den, der optages på skole til områdedelen, jfr. § 11, stk. 2, af en af uddannelserne, skal enten have gennemført 1. modul af den tekniske grunduddannelse eller 1. del af den praktiske lære i henhold til en uddannelsesaftale.

**Stk. 2.** Den, der har gennemført områdedelen uden uddannelsesaftale, kan kun fortsætte uddannelsen, hvis der foreligger en uddannelsesaftale.

§ 7.

Økisparturin er felags fyri næmingarnar, annaðhvørt teir hava tikið 1. støðiseindma í skúla ella 1. skeiðið av verkligari læru.

**Stk. 2.** Góðkendur skúli hevur skyldu til at taka øll, sum hava útbúgvingarsáttmála, inn á skúlapartin av stovnsettari útbúgving.

**Stk. 3.** Landsstýrið ásetir eftir ummæli frá vinnuskúlaráðnum reglur fyri skúlaundirvísing hjá næmingi við útbúgvingarsáttmála, um skúlaundirvísingin í einari útbúgving ella partur av henni ikki er sett á stovn.

§ 7.

Områdedelen er fælles for eleverne, hvad enten de har gennemført 1. modul af den tekniske grunduddannelse eller 1. del af den praktiske lære.

**Stk. 2.** En godkendt skole har pligt til at optage alle, der har en uddannelsesaftale, til skoleundervisning i en oprettet uddannelse.

**Stk. 3.** Landsstyret fastsætter efter indstilling fra erhvervsuddannelsesrådet nærmere regler for skoleundervisning af en elev med uddannelsesaftale, såfremt skoleundervisningen i en uddannelse eller en del deraf ikke er oprettet.

## Kapittul 3
## Útbúgvingarskipan

## Kapitel 3
## Uddannelsesstruktur

§ 8.

Útbúgvingarnar, íroknað 1. eind av støðisútbúgving innan tøkni, vara vanliga ikki meira enn 4 ár.

**Stk. 2.** Skúlagongdin er vanliga ikki longri enn 80 vikur tilsamans og ikki styttri enn 60 vikur.

**Stk. 3.** Skúlaskeiðið í økispartinum er 20 vikur. Fylgjandi skeiðini eru vanliga 10 vikur hvørt.

§ 8.

Uddannelserne, indbefattet 1. modul af den tekniske grunduddannelse, varer normalt ikke mere end 4 år.

**Stk. 2.** Skoleundervisningen varer normalt ikke længere end 80 uger ialt og ikke kortere end 60 uger.

**Stk. 3.** Skoleperioden i områdedelen er 20 uger. De følgende skoleperioder varer normalt 10 uger hver.

§ 9.

Útbúgvingartíðin, herundir býtið millum verkliga partin og skúlagongd eftir fyrsta skúlaskeiðið, sbr. § 8, stk. 3, valið av lærugreinum, sbr. § 16, stk. 2, og stevnumiðini fyri skúlaskeiðini og verkligu læruna, sbr. §§ 13 - 15 ávikavist § 18, verður skipað eftir reglum, sum landsstýrið ásetir eftir ummæli frá

§ 9.

Uddannelsestiden, herunder fordelingen af den praktiske lære og skoleundervisningen efter den første skoleperiode, jfr. § 8, stk. 3, valget at undervisningsfag, jfr. § 16, stk. 2, og formålene med skoleperioderne og den praktiske uddannelse, jfr. §§ 13 - 15 henholdsvis § 18, tilrettelægges i henhold til regler,

vinnuskúlaráðum.

§ 10.

Landsstýrið kann eftir ummæli frá vinnuskúlaráðnum áseta gjøllari reglur um, at næmingar við aðrari útbúgving ella við øðrum arbeiðsroyndum kunnu sleppa undan pørtum av verkligu lærunni.

**Stk. 2.** Landsstýrið kann áseta gjøllari reglur um, at næmingar, sum longu hava nomið kunnleika í skúla ella arbeiði, kunnu sleppa undan pørtum av skúlaundirvísingini.

**Stk. 3.** Útbúgvingarskipanin skal bera í sær, at um næmingur má gevast við útbúgving síni, skal tað verða gjørligt at taka hana uppaftur seinni.

**Stk. 4.** Eftir ummæli frá vinnuskúlaráðnum kann verða skipað fyri ískoytisskeiði til næming, sum skiftir útbúgving.

**Stk. 5.** Næmingi kann verða veitt eykaundirvísing í tann mun, hetta er neyðugt, fyri at útbúgvingin kann verða lokin.

§ 11.

Útbúgvingarnar verða bólkaðar í øki, yrki, greinir og sergreinir.

**Stk. 2.** Samsvarandi bólkingini í stk. 1 verður undirvísingin skipað í økispart, yrkispart, greinapart og sergreinapart.

**Stk. 3.** Landsstýrið ásetir eftir ummæli frá vinnuskúlaráðnum reglur um, hvørt ein útbúgving verður roknað sum

der fastsættes af landsstyret efter indstilling fra erhvervsuddannelsesrådet.

§ 10.

Landsstyret kan efter indstilling fra erhvervsuddannelsesrådet fastsætte nærmere regler om, at elever med anden uddannelse eller med andre beskæftigelsesmæssige forudsætninger kan fritages for dele af den praktiske lære.

**Stk. 2.** Landsstyret kan fastsætte nærmere regler om, at elever, der allerede har fået undervisning i skole eller arbejde, kan fritages for dele af skoleundervisningen.

**Stk. 3.** Uddannelsesstrukturen skal indebære, at hvis en elev afbryder sin uddannelse, skal han have mulighed for senere at kunne genoptage uddannelsen.

**Stk. 4.** Efter indstilling fra erhvervsuddannelsesrådet kan der tilrettelægges supplerende kursus med henblik på elevers overgang til en anden uddannelse.

**Stk. 5.** En elev kan få supplerende undervisning, såfremt dette er nødvendigt, for at uddannelsen kan afsluttes.

§ 11.

Uddannelserne grupperes i områder, fag, grene og specialer.

**Stk. 2.** I overensstemmelse med grupperingen i stk. 1 opdeles undervisningen i en områdedel, en fagdel, en grendel og en specialedel.

**Stk. 3.** Landsstyret fastsætter efter indstilling fra erhvervsuddannelsesrådet regler om, hvorvidt en uddannel-

yrkisútbúgving við sáttmálaskyldu, og hvussu útbúgvingarnar verða skipaðar í bólkar eftir stk. 1, og hvussu undirvísingin verður skipað í pørtum eftir stk. 2.

**§ 12.**

Útreiðslurnar, ið standast av undirvísingini, verða útgoldnar eftir reglum, sum landsstýrið ásetir.

## Kapittul 4
## Innihaldið í útbúgvingunum

**§ 13.**

Innihaldið í útbúgvingunum verður skipað samsvarandi stevnumiðunum í § 2 og á tann hátt, at verkliga læran og skúlagongdin er ein samanhangandi heild.

**Stk. 2.** Undirvísingin í økispartinum skal verða skipað á slíkan hátt, at næminginum fer eina heildarfatan. Seinni miðar undirvísingin í móti at veita næminginum førleika í ávísum yrki, ávísari grein og ávísari sergrein. Undirvísingin skal verða so skipað, at hon í mest møguligan mun nøktar skiftandi førleikakrøv frá vinnuni.

**§ 14.**

Skúlaundirvísingin fatar um almennar og kravdar støðislærugreinir, yrkislærugreinir, serlærugreinir og vallærugreinir.

**Stk. 2.** Støðislærugreinirnar og yrkislærugreinirnar skulu vanliga hava hvør sín triðing av samlaðu tíðini og serlærugreinirnar og vallærugreinirnar

se skal anses for at være en erhvervsuddannelse med aftalepligt, og hvordan uddannelserne opdeles i grupper ifølge stk. 1, og hvordan undervisningen opdeles i dele ifølge stk. 2.

**§ 12.**

Udgifterne til undervisningen udbetales efter regler, som fastsættes af landsstyret.

## Kapitel 4
## Indholdet af uddannelserne

**§ 13.**

Indholdet af uddannelserne skal tilrettelægges i overensstemmelse med formålene i § 2 og således, at den praktiske lære og skoleundervisningen udgør et sammenhængende forløb.

**Stk. 2.** Undervisningen i områdedelen skal være således tilrettelagt, at eleven får en helhedsorientering. Senere hen sigter undervisningen mod at give eleverne kompetence i et bestemt fag, en bestemt gren og et bestemt speciale. Undervisningen tilrettelægges med henblik på i størst muligt omfang at tilgodese skiftende kvalifikationsbehov i erhvervslivet.

**§ 14.**

Skoleundervisningen omfatter almene og obligatoriske grundfag, områdefag, specialefag og valgfag.

**Stk. 2.** Grundfagene og områdefagene skal sædvanligvis tage hver sin tredjedel af den samlede tid og specialefagene og valgfagene hver sin sjet-

hvør sín sættapart. Serlærugreinir eru vanliga bert í sergreinapartinum.

**Stk. 3.** Tær almennu støðislærugreinirnar kunnu í økispartinum verða havdar í staðin fyri tær kravdu støðislærugreinirnar, og vallærugreinirnar kunnu verða tiknar sum kravdar støðislærugreinir ella yrkislærugreinir. Undirvísingin í kravdum støðislærugreinum kann verða skipað felags fyri fleiri útbúgvingar.

§ 15.

Tær almennu støðislærugreinirnar fata um verkliga og ástøðiliga undirvísing, ið skal miða í móti at menna tann fakliga kunnleikan.

**Stk. 2.** Tær kravdu støðislærugreinirnar fata um verkliga og ástøðiliga undirvísing, ið skal miða í móti at menna tann fakliga kunnleikan.

**Stk. 3.** Yrkislærugreinirnar fata um verkliga og ástøðiliga undirvísing, ið sermerkja viðkomandi útbúgving, og sum skal veita næminginum bæði almennan kunnleika og fakligan førleika.

**Stk. 4.** Serlærugreinirnar, sum eru lærugreinir á hægsta fakliga støði í útbúgvingini, fata um verkliga og ástøðiliga undirvísing, ið skal miða í móti at veita næminginum serligan førleika í ávísari grein. Næmingurin velur sergrein innan ta útbúgvingina, sum viðkomandi hevur gjørt útbúgvingarsáttmála um.

**Stk. 5.** Vallærugreinirnar skulu miða í móti at nøkta áhugamál næmingsins, stuðla áhugan fyri framhaldandi útbúgving og menna yrkis- og lestrarførleikan.

tedel. Specialefagene er sædvanligvis kun i specialedelen.

**Stk. 3.** De almene grundfag kan i områdedelen træde i stedet for de obligatoriske grundfag, og valgfagene kan læses som obligatoriske grundfag eller områdefag. Undervisningen i obligatoriske grundfag kan gives fælles for flere uddannelser.

§ 15.

De almene grundfag omfatter praktisk og teoretisk undervisning, der sigter imod at udvikle den faglige kundskab.

**Stk. 2.** De obligatoriske grundfag omfatter praktisk og teoretisk undervisning, der sigter imod at styrke den faglige viden.

**Stk. 3.** Områdefagene omfatter praktisk og teoretisk undervisning, der er speciel for den pågældende uddannelse, og som skal give eleverne både almen viden og faglig kompetence.

**Stk. 4.** Specialefagene, som er fag på højeste faglige niveau i uddannelsen, indeholder praktisk og teoretisk undervisning, der sigter imod at give eleven kompetence i en bestemt gren. Eleven vælger speciale inden for den uddannelse, som vedkommende har indgået uddannelsesaftale om.

**Stk. 5.** Valgfagene sigter imod at tilgodese elevens interesser, motivere til fortsat uddannelse og udvikle den faglige og studiemæssige kompetence.

§ 16.

Landsstýrið ásetir eftir ummæli frá vinnuskúlaráðnum gjøllari reglur um, hvørjar almennar støðislærugreinir skulu vera í økispartinum.

**Stk. 2.** Landsstýrið ásetir eftir ummæli frá vinnuskúlaráðnum, hvørjar kravdar støðislærugreinir, yrkislærugreinir, sergreinir og serlærugreinir skulu verða tengdar at tí ávísu útbúgvingini.

**Stk. 3.** Skúlarnir gera av, hvørjar vallærugreinir verða bodnar út á skúlunum.

§ 16.

Landsstyret fastsætter efter indstilling fra erhvervsuddannelsesrådet nærmere regler om, hvilke almene grundfag, der skal være i områdedelen.

**Stk. 2.** Landsstyret fastsætter efter indstilling fra erhvervsuddannelsesrådet, hvilke obligatoriske grundfag, områdefag, specialer og specialfag, der skal være knyttede til den pågældende uddannelse.

**Stk. 3.** Skolerne bestemmer, hvilke valgfag, der tilbydes på skolerne.

§ 17.

Undirvísingin verður løgd til rættis við ynskjum næmingsins í huga og lagað eftir fortreytum og áhuga hansara.

**Stk. 2.** Næmingur, sum hevur tørv á tí, kann fáa serundirvísing og annan sernámsfrøðiligan stuðul.

**Stk. 3.** Næmingum verður veitt ráð og vegleiðing viðvíkjandi útbúgvingini, herundir um skúlaundirvísing, verkliga læru og persónlig viðurskifti.

**Stk. 4.** Landsstýrið ásetir gjøllari reglur um tey í stk. 2 og 3 nevndu viðurskifti.

§ 17.

Undervisningen skal tilrettelægges ud fra elevens ønsker og tilpasses dennes forudsætninger og interesser.

**Stk. 2.** En elev, der har behov for det, kan få specialundervisning og anden specialpædagogisk bistand.

**Stk. 3.** Der gives eleverne råd og vejledning vedrørende uddannelsen, herunder om skoleundervisningen, den praktiske lære og personlige forhold.

**Stk. 4.** Landsstyret fastsætter nærmere regler for de i stk. 2 og 3 nævnte forhold.

§ 18.

Verkliga læran fer fram á einum ella fleiri læruplássum, ið verða góðkend av landsstýrinum eftir gjøllari reglum, sum landsstýrið ásetir, og er grundað á útbúgvingarsáttmála millum næmingin og viðkomandi læruplass.

**Stk. 2.** Verkliga læran fer fram eftir gjøllari reglum, sum landsstýrið ásetir eftir ummæli frá vinnuskúlaráðnum,

§ 18.

Den praktiske lære foregår på en eller flere praktikvirksomheder, der godkendes af landsstyret efter nærmere regler, som landsstyret fastsætter, og på grundlag af en uddannelsesaftale mellem eleven og vedkommende praktikplads.

**Stk. 2.** Den praktiske lære foregår efter nærmere regler, som landsstyret fastsætter efter indstilling fra erhvervs-

smb. § 9. Reglurnar skulu innihalda stevnumiðini hjá verkligu læruni, lýsa tað arbeiðsøkið og virksemið, sum verkliga læran skal fevna um, og tryggja, at verkliga læran og skúlaundirvísingin styðja hvør aðra. Reglurnar skulu harumframt lýsa sambandið millum skúla, næming og virki.

uddannelsesrådet, jfr. § 9. Reglerne skal indeholde formålene med den praktiske lære, beskrive det arbejdsområde og den virksomhed, som den praktiske lære skal omfatte, og sikre, at den praktiske lære og skoleundervisningen supplerer hinanden. Reglerne skal endvidere beskrive forbindelsen mellem skole, elev og virksomhed.

**§ 19.**

Prógv verður givið fyri fullførda útbúgving, bæði fyri lokna skúlaundirvísing og verkliga læru. Næmingur, sum gevst í útbúgvingini, hevur rætt til at fáa váttan fyri tann partin, ið er lokin.

**Stk. 2.** Próvtøkur verða skipaðar eftir gjøllari reglum, sum landsstýrið ásetir eftir ummæli frá vinnuskúlaráðnum.

**§ 19.**

Der udstedes eksamensbevis for afsluttet uddannelse, både for den gennemførte skoleundervisning og den praktiske lære. En elev, der afbryder uddannelsen, har ret til at få dokumentation for den del, der er gennemført.

**Stk. 2.** Eksamen tilrettelægges efter nærmere regler, som landsstyret fastsætter efter indstilling fra erhvervsuddannelsesrådet.

**§ 20.**

Sveinaroynd í teimum einstøku útbúgvingunum verður hildin í tann mun, hetta verður samtykt av landsstýrinum eftir ummæli frá vinnuskúlaráðnum, eftir reglum, sum landsstýrið ásetur eftir ummæli frá vinnuskúlaráðnum.

**Stk. 2.** Samsýning til skoðanarmeistarar verður at rinda sum vanlig prógdómarasamsýning. Tilfar til sveinaroyndir verða at gjalda yvir skúlans rakstur.

**§ 20.**

Svendeprøve i de enkelte uddannelser afholdes i det omfang, landsstyret beslutter dette efter indstilling fra erhvervsuddannelsesrådet, ifølge regler, der fastsættes af landsstyret efter indstilling fra erhvervsuddannelsesrådet.

**Stk. 2.** Vederlag til skuemestre erlægges som sædvanligt censorvederlag. Materiale til svendeprøver betales over skolens drift.

## Kapittel 5
## Vinnuskúlaráð

**§ 21.**

Landsstýrið setir eitt vinnuskúlaráð, ið skal verða landsstýrinum ráðgevandi í

## Kapitel 5
## Erhvervsuddannelsesråd

**§ 21.**

Landsstyret nedsætter et erhvervsuddannelsesråd, som er rådgivende for

spurningum viðvíkjandi øllum vinnuskúlum.

## Kapittul 6
## Aðrar ásetanir

### § 22.

Landsstýrið kann í serligum førum við tí endamáli at fremja útbúgvingarroyndir víkja frá reglunum í kapitlunum 3 og 4 í hesi lóg.

**Stk. 2.** Landsstýrið fær í lag avtalur við skúlamyndugleikar í øðrum londum um skúlaundirvísing í teimum yrkisútbúgvingum og undirvísingarpørtum, sum tað ikki sjálvt hevur sett á stovn.

## Kapittul 7
## Gildiskoma

### § 23.

Henda lóg fær gildi 1. august 1993.

landsstyret i spørgsmål vedrørende erhvervsskoler.

## Kapitel 6
## Andre bestemmelser

### § 22.

Landsstyret kan i særlige tilfælde med det formål at fremme uddannelsesforsøg gøre undtagelser fra reglerne i kapitel 3 og 4 i denne lov.

**Stk. 2.** Landsstyret tilvejebringer aftaler med skolemyndigheder i andre lande om skoleundervisning i de erhvervsuddannelser og undervisningsdele, som det ikke selv har oprettet.

## Kapitel 7
## Ikrafttrædelse

### § 23.

Denne lov træder i kraft 1. august 1993.

**Viðmerkingar:**

Av skrivi til Føroya Landsstýri frá Landsskúlafyrisitingini, ið er dagfest 25. februar 1993, framgongur m.a., at tørvur er á yrkisútbúgvingarlóg. Sagt verður við greiðum orðum, at við ongari lóg standa vit á berum og hava ongar heimildir viðvíkjandi skúlapartinum á útbúgvingarøkinum.

Ásannandi hetta leggur Føroya Landsstýri tí fram uppskot til nýggja yrkisútbúgvingarlóg, ið hevur sum mál at skapa grundarlag fyri skúlapartinum av lærlingaútbúgvingini. Roynt verður sostatt at fáa til vega tíðarhóskandi útbúgvingarskipan til tann partin av ungdóminum, sum ætlar sær at nema tøkniliga yrkisútbúgving.

Landsstýrið arbeiðir í løtuni við at gera uppskot til ráðskipan fyri útbúgvingarnar á vinnuøkinum. Ætlanin er at fáa til vega ráð, har vinnan og feløgini eru umboðað, sum skal verða ráðgevandi mótvegis landsstýrinum í øllum spurningum, sum viðvíkja vinnuligum útbúgvingum. Ætlandi verður hetta arbeiði liðugt til ólavsøkutingsetuna.

Samstundis verður - í samráð við vinnuna og skúlamyndugleikamar - arbeitt við nýggjum lógartilfari um læruplass, útbúgvingarsáttmálar og øðrum viðkomandi spurningum, sum hava tilknýti til útbúgvingina av hesum parti av ungdóminum.

Í sambandi við omanfyri standandi verður sagt frá, at landsstýrið ætlar at leggja fram uppskot til nýggja lóg um skúlafyrisiting í komandi ólavsøkutingsetu og heruppií reglur um skipan av vinnuskúlaráðnum.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 180/1992: Løgtingslóg um tøkniligar yrkisútbúgvingar.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 15. apríl 1993 og eftir 1. viðgerð 21. apríl 1993 beint í mentannar- og skúlanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt lógaruppskotið, sum ber tað heldur óhepna heitið "tøkniligar yrkisútbúgvingar." Útbúgvingin miðar eisini móti handverki, sum vanliga ikki ber navn av at hava nakað við tøkni at gera.

Útbúgvingarnar verða bólkaðar upp í øki, yrki, greinir og sergreinir, og er tað landsstýrið, sum eftir ummæli frá vinnuskúlaráðnum, tekur avgerð í øllum spurningum viðvíkjandi vinnuskúlunum.

Útbúgvingarnar verða skipaðar soleiðis, at næmingurin skiftir millum verkliga læru í vinnuni og undirvísing í skúla, og upplýst verður í málinum, at lógaruppskotið lýkur allar fortreytir fyri einari dagførdari skipan á hædd við aðrar líknandi í grannalondum okkara.

Atgongd til útbúgvingarnar hava tey, sum hava tikið fyrstu eindina av støðisútbúgvingini innan tøkni ella fyrsta skeiðið av verkligu læruni sambært útbúgvingarsáttmála.

Útbúgvingarnar vara vanliga ikki meiri enn 4 ár, og er skúlagongdin vanliga ikki longri enn 80 vikur, og ikki stytri enn 60 vikur. Útbúgvingartíðin verður annars ásett av landsstýrinum eftir ummæli frá vinnuskúlaráðnum, herundir býtið millum verkliga partin og skúlagongdina eftir fyrsta skúlaskeiðið.

Eisini eru ásetingar um, at næmingar við ymiskum fortreytum kunna sleppa undan pørtum av verkligu læruni, tó bert eftir ummæli frá vinnuskúlaráðnum, eins og næmingar við ávísum skúlakunnleika kunna sleppa undan pørtum av skúlaundirvísingini.

Upplýst verður í málinum, at landsstýrið arbeiðir við at gera uppskot til ráðsskipan fyri útbúgvingarnar á vinnuøkinum, og er ætlanin at skipa eitt ráð, har vinnan og feløgini eru umboðað. Sagt verður, at hetta arbeiðið verður gjørt liðugt

til Ólavsøkutingsetuna, og verður tá eitt í lógaruppskotinum nevnt "vinnuskúlaráð," stovnsett.

Tað er umráðandi, at hetta arbeiðið verður gjørt í samráð við vinnuna, feløgini og skúlamyndugleikarnar, soleiðis at tað fæst eitt mennandi samstarv í lag millum hesar partar útbúgvingini at fremja. Eisini verða hesir partar at samstarva um innihaldið í nýggjum lógartilfari um lærupláss, útbúgvingarsáttmálar og aðrar viðkomandi spurningar.

Saman við hesum lógaruppskoti er lógaruppskot um hægri tøkniliga útbúgving og hægri handilsliga útbúgving lagt á tingborð, og verður tað hildið gagnligt við einum so fjølbroyttum og víttfevnandi tilboði til teirra, sum ætla sær at nema víðari útbúgving innan hesi øki.

Fyri at menna samstarvið millum vinnuna, feløgini, landsstýrið og skúlamyndugleikarnar verður skotið upp, at vinnuskúlaráðið verður tilmælandi í staðin fyri ummælandi.

Ein samdur meiriluti í mentunnar- og skúlanevndini mælir løgtinginum til at samtykkja lógaruppskotið við hesum:

**broytingaruppskoti**

**til**

**uppskot landsstýrisins**

Í § 4 verður "ummæli" broytt til "tilmæli."

Í § 5, stk 1 verður "ummæli" broytt til "tilmæli."

Í § 7, stk. 3 verður "ummæli" broytt til "tilmæli."

Í § 9 verður "ummæli" broytt til "tilmæli."

Í § 10, stk. 1 og stk. 4 verður "ummæli" broytt til "tilmæli."

Í § 11, stk. 3 verður "ummæli" broytt til "tilmæli."

Í § 15, stk. 2 verður "fakliga" broytt til "almenna."

Í § 16, stk. 1 og 2 verður "ummæli" broytt til "tilmæli."

Í § 18, stk. 2 verður "ummæli" broytt til "tilmæli."

I § 15 stk. 2 ændres "faglig" til "officiel."

Í § 19, stk. 2 verður "ummæli" broytt til "tilmæli."

Í § 20, stk. 1 verður "ummæli" broytt til "tilmæli."

Grein 21 verður soljóðandi: "Landsstýrið setir eitt vinnuskúlaráð, ið skal verða landsstýrinum ráðgevandi og tilmælandi í spurningum viðvíkjandi øllum vinnuskúlunum".

Minnilutin (Óli Breckmann) førir fram, at meistarafelagið ikki kann taka undir við, at lógaruppskotið, sum meirilutin mælir til at samtykkja, verður sett í gildi. Tí er vandi fyri, at lýsingin frá 19. apríl 1993 frá Føroya Handverksmeistarafelag stendur við, um at handverksmeistarar ikki taka lærlingar, eftir at lógaruppskotið er samtykt. Tí setir minnilutin fram soljóðandi:

**broytingaruppskot**

**til**

**uppskot landsstýrisins**

| | |
|---|---|
| § 23 verður soljóðandi: | § 23 affattes således: |
| "Henda lóg kemur ikki í gildi, fyrrenn lóg um ráðskipan er endaliga samtykt í tinginum." | "Denne lov får ikke gyldighed, før lov om rådsordning er endeligt vedtaget i lagtinget." |

Minnilutin (Terje Davidsen) metir at mál sum hetta krevja, at gott samstarv er millum vinnufeløgini, landsstýrið og landsskúlafyrisitingina. Frá vinnuni er ført fram, at teir ikki føla seg tryggar við hesum uppskoti og viðgerðini av tí. Teir hava skotið upp at danska lóg nr. 211: "Om erhvervsuddannelse" við ávísum tillagingum verður sett í gildið fyri Føroyar.

Minnilutin mælir tí til, at málið verður víst aftur út í landsstýrið, so nýtt uppskot har kann verða tilevnað solciðis, at vinnufeløgini føla seg trygg við uppskotið.

Tí verður sett fram soljóðandi:

## Uppskot

## til

## samtyktar

Løgtingið samtykkir, at beina mál nr. 180/1992: Lóg um tøkniliga yrkisútbúgving aftur til landsstýrið. Landsstýrinum verður álagt at evna uppskot um tøkniliga yrkisútbúgving, sum er í tráð við ynski hjá vinnufeløgunum og leggja hetta fyri tingið sum skjótast.

## broytingaruppskot

## til

*løgtingsmál nr. 180/1992: Løgtingslóg um tøkniligar yrkisútbúgvingar.*

§ 21 verður soljóðandi:

"Landsstýrið setur eitt vinnuútbúgvingarráð, ið skal verða landsstýrinum ráðgevandi og tilmælandi í spurningum viðvíkjandi vinnuútbúgvingum."

§ 21 formuleres således:

"landsstyret nedsætter et erhvervsuddannelsesråd, der skal rådgive og foretage indstilninger for landsstyret vedrørende erhvervsuddannelser".

**Viðmerkingar:**

Av tí at útbúgvingarnar í hesi lóg verða skipaðar soleiðis, at næmingarnir skifta ímillum verkliga læru í vinnuni og undirvísing í skúla er rættast at ráðið, sum skal gera tilmæli um hesar útbúgvingar, verður eitt vinnuútbúgvingarráð.

# 181. "Lov om tilskud til Færøernes Hjemmestyre"

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið mælir ríkismyndugleikunum til, at "Lov om tilskud til Færøernes Hjemmestyre" verður sett í gildi í Føroyum.

**Viðmerkingar:**

Hjálagt er uppskot, tilevnað í samráð við fíggjarmálaráðið og almannamálaráðið eftir givnum treytum.

Lógaruppskotið fevnir um ein generellan heildarveitingarstuðul til Føroyar í staðin fyri núverandi heildarveitingarstuðulsskipan og endurgjaldsskipanina á almannaøkinum.

Lógin skal vera í gildi í tíðarskeiðinum 1. juli 1993 til 31. desember 1994.

Útgangsstøðið er útreiðslur ríkisins á fíggjarlógini fyri 1993 til heildarveitingar og endurgjald til Føroyar.

Á fundi 6. apríl 1993 í fíggjarmálaráðnum samdust stjórnin og landsstýrið um at seta eina dansk-føroyska embætismannanevnd at gera útgreiningararbeiði við atliti til at kunna seta í verk eina nýggja heildarveitingarskipan fyri Føroyar frá 1. januar 1995.

Viðvíkjandi fastsetan av heildarveitingarupphæddini fyri 1995 verður útgangsstøðið tikið í endaligu uppgerðini av endurgjaldi, goldið í 1992 og 1993 á almannaøkinum.

Viðmerkt er eisini, at heildarveitingarupphæddin kann verða rættað í mun til útreiðslur, ríkið møguliga fær sambært komandi løgtingslógum (t.d. broytingin í arvagjaldinum). Úgreiningararbeiðið skal haraftrat fevna um smíð av "ramnulógum" viðvíkjandi almannamálum og heilsumálum. Hetta arbeiðið skal vera liðugt innan árslok 1993.

Útgreiningararbeiðið verður grundarlagið undir samráðingunum um broytingar í heildarveitingarskipanini frá 1995.

Viðvíkjandi nærri upplýsingum verður vísst til viðmerkingarnar í lógaruppskotinum.

# Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 181/1992 "Lov om tilskud til Færøernes Hjemmestyre".*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 4. mai 1993 og eftir 1. viðgerð tann 10. mai 1993 beint í fíggjarnevndina.

Í málinum er eitt uppskot til samtyktar, har landsstýrið biður løgtingið mæla ríkismyndugleikunum til, at "Lov om tilskud til Færøernes Hjemmestyre" verður sett í gildi í Føroyum.

Í viðmerkingunum til uppskotið vísir landsstýrið til fund í fíggjarmálaráðnum tann 6. apríl 1993, har danska stjórnin og landsstýrið samdust um at seta eina dansk- føroyska embætismannanevnd at gera útgreiningararbeiði við atliti til at seta í verk eina nýggja heildarveitingarskipan fyri Føroyar frá 1. januar 1995.

Eftir uppskotinum skal lógin í løgtingsmáli nr. 181/1992 bert verða í gildi frá 1. juli 1993 til 31. desember 1993. Tá skal onnur lóg, við útgangsstøði í teimum samráðinguin, sum skulu verða í dansk - føroysku embætismannanevndini, koma í staðin fyri lógina, sum landsstýrið mælir til at seta í gildi nú frá 1. juli .

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið. Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í cin meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Hergeir Nielsen, Asbjørn Jocnsen og Anfinn Kallsberg) kennir seg bundnan av teirri avtalu, sum landsstýrið hevur gjørt við donsku ríkisstjórnina tann 6. apríl 1993 og mælir sostatt til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

Minnilutin (Tordur J. Niclasen) ásannar, at vit bæði so og so eru komin undir útlendska umsiting. Ein treyt fyri og onnur eftir er á okkum løgd og nú henda, ið gjørd er 6. apríl 1993 millum donsku stjórnina og landsstýrið.

Tíverri má ásannast, at vit ikki hava dugað at húsast serliga skynsamt, hava ikki skilt týdningin av, at samsvar átti at verða ímillum inntøkusíðu og útreiðslusíðu.

Tað sum frá einum tjóðskaparligum sjónarmiði má sigast at verða ein sorgarleikur er, hvat hesin sokallaði tjóðveldispolitikkurin hevur ført við sær, at vit eru vorðin minni og minni sjálvbjargin, tættari og tættari knýtt at donsku ríkisstjórnini og harvið fíggjarliga heft á hondum og fótum.

Ein avleiðing av hesum sokallaða tjóðveldispolitikki er so hon, at okkum er álagt, at henda lógin om tilskud til Færøernes Hjemmestyre nú verður sett í gildi fyri Føroyar.

Ein skilir væl danir, ið hava sett hesar treytir, tá hugsað verður um, at hetta er danskur skattgjaldarapeningur, ið soleiðis kemur inn í tað føroyska samfelagið.

Hinvegin er tað óskiljandi, at nakar skal fáa seg til at geva dønum skuldina fyri støðuna, sum hon er vorðin her á landi.

Meginreglan er tann, at læra vit ikki at húsast við tí, vit hava og harvið prógva, at vit eru før fyri at umsita kapitalin, ja, so eru ikki fortreytirnar fyri at gerast meir og meir sjálvbjargin til staðar - heilt burtur við tykist tað tí, at summir í dag nú vilja geva heimastýrislógini skuld fyri, at vit eru komin í ta støðu, sum vit eru. Hetta má av sonnum sigast at verða undanførsla og tað við lít.

Nei, vit eiga at taka í egnan barm og prógva bæði yvir fyri okkum sjálvum, yvir fyri skattgjaldaranum og teim, sum nú árliga veita okkum knappa milliard í stuðuli, at vit megna at húsast við tí vit hava um hendi - sjálvt um tað er munandi minni enn árini frammanundan.

Hvat uppskotinum annars viðvíkur tekur minnilutin (Tordur J. Niclasen) støðu í tingsalinum.

Minnilutin (Finnbogi Arge) førir fram:

Í 1987 fingu vit blokkstuðulin í staðin fyri refusiónsskipanina, sum var galdandi frammanundan. Hetta hevði við sær, at stuðulin til heilsuverkið lór í blokkin, bert ávísar eftirlønir vóru undantiknar. Samsundis fór serforsorgin og útreiðslurnar hjá statinum til ellis- og røktarheim, heimahjálp og barnagjald o.a. eisini inn í blokkstuðulsskipanina.

Aðrar veitingar undir forsorgarlógini, eftirlønarlógunum og dagpeningalógini hildu fram sum proscntvíst endurgjald eftir gomlu skipanini, har danir rinda 50% av útreiðslunum til fólkapensjón, invalidupensjón og einkjupensjón. Á øðrum økjum gjalda teir 25% av útreiðslunum.

Umsitingarliga vóru broytingar framdar, soleiðis at vit fingu fríari ræsur og harvið minkandi samstarv millum partarnar. Fært varð fram, at umsitingarlig og fíggjarlig ábyrgd áttu at hanga saman. Men vit mugu í dag ásanna, at hetta ikki gjørdist, sum menn høvdu vónað. Hendingarnar á almannastovuni er bert eitt dømi um, at vit ikki hava livað upp til hetta álit, sum danir litu okkum til.

Tá ið samgongan millum Javnaðar- og Fólkaflokkin fyri aðru ferð tann 1.februar 1993 rendi seg fasta fíggjarliga, kravdu danir, at tær veitingar úr Danmark, sum enn vóru uttanfyri, vórðu lagdar inn í blokkstuðulin.

Blokkstuðulsskipanin er gjøgnumført innanlendis í Danmark, men hetta var neyvan einasta orsøk til ynskini hjá dønum at fremja skipanina í Føroyum eisini. Tá ið danir í fyrru helvt av áttatiárunum borðreiddu við eini blokkskipan, segði Sambandsflokkurin nei, og úrslitið varð, at skipanin ikki varð sett í verk.

Fíggjarliga vanstýringin hevur helst gjørt sítt til, at danir nú sum treyt fyri lánsveiting krevja blokkskipanina setta í gildi. Hóast sagt verður, at umsitingarlig og fíggjarlig ábyrgd má hanga saman, so er sannleikin helst tann, at danir ikki hava álit á føroysku dispositiónunum og vilja tryggja sær, at fantasifult føroyskt lóggávusmíð ikki hevur ein meirkostnað við sær fyri tann danska skattaborgaran.

Hetta er ikki annað enn rímiligt, men so sanniliga heldur ikki heilt vandaleyst fyri allar teir føroyingar, sum trygt hava kunnað litið á, at teir fingu pensiónina, dagpeningin ella tað veiting, talan var um.

Føroysk landsstýri hava til fulnar prógvað, at fíggjarligt skynsemi ikki altíð hevur verið í hásæti. Av tí sama eru ovurstórar skattabyrðar lagdar á fólk. Við at leggja scinastu veitingarnar uttanfyri blokkin inn í blokkin, verður vandi fyri, at tað fer at ganga útyvir almannaveitingar av ymiskum slag, skúlaverkið og heilsuverkið, av tí at leiðslan í Tinganesi hevur brúkt peningin til annað endamál.

Tískil liggur ein sera stór ábyrgd á teimum, sum nú manna Tinganes, at tryggja, at sosiala veitingarbýti ikki verður skert orsakað av "tvungnu" yvirtøkuni.

Sambandsflokkurin má taka til eftirtektar, at hann hevur verið við undirlutan í spurninginum um blokkstuðulin. Sambandsflokkurin hevur verið ímóti skipanini, eisini tá danskar stjórnir hava ynskt blokkstuðulsskipanina innførda í Føroyum, m.a. av tí at flokkurin hevur óttast sosialu avleiðingarnar av slíkari yvirtøku og at sosiala trygdin varð innholað av tí, at veitingarnar fóru til onnur endamál enn upprunaliga ætlað.

Javnaðarflokkurin, sum einaferð var tann flokkur, ið royndi at tryggja føroyingum ellisrentuna og eitt sosialt støði, hevur fingið sín vilja og disponerar nú frítt yvir øllum veitingum úr Danmark.

Men samstundis hevur hann sett tann sosiala politikkin upp á spæl til frama fyri ein sera ivingarsaman loysingarpolitikk, sum ikki á nakran hátt kann tryggja okkum eitt sosialt støði í landinum heldur enn at breyðføða okkara fólk.

Tað skal vera okkara vón, at tað sum vit óttast fer at henda, hóast alt ikki verður veruleiki. Men tað krevur ein meiriluta á tingi, sum hevur vilja til at skúgva loysingarpolitikk til viks til frama fyri ein politikk, sum fyrst og fremst gongur út uppá at tryggja føroyingum ein rímiligan livifót og eitt sosialt trygdarnet.

Men við at fara í samgongu við Tjóðveldisflokkin, hevur Javnaðarflokkurin týðuliga og greitt sent boðskapin út, bæði til føroyingar og danir, m.a. ta donsku stjórnina, at tjóðskaparpolitikkurin er settur í hásæti, og at javnaðarleiðslan er til reiðar at fremja henda politikk uttan mun til búskaparliga og sosiala prísin.

Veitingarnar úr Danmark hava tryggjað føroyingum eitt sosialt støði hóast fiskivinnan hevur givið undirskot. Vandi er nú fyri, at hetta verður øðrvísi í framtíðini.

Við hesum viðmerkingum boðar minnilutin (Finnbogi Arge) frá, at hann ikki tekur undir við uppskotinum.

# 182. Broyting í løgtingslóg um evnisskráir hjá almennum myndugleikum

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um evnisskráir hjá almennum myndugleikum.*

*lagtingslov om ændring i lagtingslov om offentlige myndigheders registre.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 62 frá 5. juni 1984 um evnisskráir hjá almennum myndugleikum við seinni broytingum verða hesar broytingar gjørdar:

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 62 af 5. juni 1984 om offentlige myndigheders registre med senere ændringer, foretages følgende ændringer:

1) Í § 9, stk. 2, 3. punktum verður orðið "skattavaldinum" broytt til: "Toll- og Skattstovu Føroya".
2) Í § 9, stk. 2, verður skoytt uppi sum nýtt 7. punktum:
"Almannastovan kann nýta persónnummarið í samskiftinum við Toll- og Skattstovu Føroya og í samband við eftirlit og umsiting av almannalóggávuni."

1) I § 9, stk. 2, 3. punktum ændres ordet "skattevæsenet" til: "Toll- og Skattstovu Føroya".
2) I § 9, stk. 2, tilføjes som nyt 7. punktum:
"Almannastovan kan anvende personnummeret i kommunikationen med Toll- og Skattstovu Føroya og i forbindelse med kontrol og administration af sociallovgivningen."

**§ 2.**

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

**Viðmerkingar:**

Toll- og Skattstova Føroya hevur, fyri at landskassin ikki skal missa pening, fyri neyðini at kunna mótrokna skatt- og meirvirðisgjøld og fyri at gera tað heilt greitt, at tað ikki er skattavaldið sum var, men stovnurin Toll- og Skattstova Føroya,

ið ásetingin viðvíkur, mælir landsstýrið til, at lógin verður broytt, soleiðis at tað á stovninum sum so, kann nýtast persónnummar og eisini samkoyring.

Almannastovan hevur fyri neyðini at kunna nýta persónnummarið fyri eintýðugt at kunna sanna, hvørjir persónarnar eru, sum søkja um ella skulu hava einhvørja almannaveiting, og til at kanna eftir, at t.d. peningaflytingar eru í lagi, og eisini fyri at tryggja, at persónar fáa tað, ið teir hava rætt til. Tað er eitt krav bæði frá føroyskari og danskari síðu, at edv-viðurskiftini á Almannastovuni nú verða í lagi, og er lógarbroytingin ein fortreyt fyri hesum.

Landsstýrið mælir løgtinginum til at samtykkja broytingarnar.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 182/1992: Broyting í løgtingslóg um evnisskráir hjá almennum myndugleikum.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 4. mai 1993 og eftir 1. viðgerð 10. mai 1993 beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og mælir ein meiriluti (Mikkjal Sørensen, Hergeir Nielsen, Helena Dam á Neystabø og Lisbeth. L. Petersen) til at samtykkja uppskot landsstýrisins, meðan minnilutin (Birgir Danielsen) ikki tekur undir við málinum og setir einki uppskot fram.

# 183. Fyrisitingarlóg (92/91)

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um innlit í fyrisitingina.*

**Kap. 1. Lógarøkið.**

**§ 1.**

Lógin er galdandi fyri alt virksemi hjá almennu fyrisitingini undir heimastýrinum, jbr. tó §§ 2 og 3.

**Stk. 2.** Lógin er eisini galdandi fyri interkommunalar felagsskapir.

**Stk. 3.** Landsstýrið kann áseta reglur um, at lógin skal verða galdandi fyri nærri ásett felǿg, stovnar, felagsskapir v.m., sum ikki kunnu roknast til ta almennu fyrisitingina. Hetta er tó bert galdandi um útreiðslurnar av teirra virksemi í høvuðsheitunum verða rindaðar av landi ella kommunum, ella í tann mun tey við ella sambært lóg hava fingið heimild til at taka avgerð vegna land ella kommunu. Landsstáyrið kann herundir áseta nærri reglur um varðveitslu v.m. av skjølum.

**§ 2.**

Fyri mál um setan í starv ella flytan í hægri starv, er bert ásetingin í § 6 galdandi.

**Stk. 2.** Lóggávumál, herundir játtanarlógir, koma bert undir lógina, tá lóguppskot er framlagt í løgtinginum.

*lagtingslov om offentlighed i forvaltningen.*

**Kap. 1. Lovens område.**

**§ 1.**

Loven gælder for al virksomhed, der udøves af den offentlige forvaltning under hjemmestyret, jfr. dog §§ 2 og 3.

**Stk. 2.** Loven gælder endvidere for interkommunale fællesskaber.

**Stk. 3.** Landsstyret kan fastsætte regler om, at loven skal gælde for nærmere angivne selskaber, institutioner, foreninger m.v., som ikke kan henregnes til den offentlige forvaltning. Det gælder dog kun såfremt udgifterne ved deres virksomhed overvejende dækkes af land eller kommune, eller i det omfang de ved eller i henhold til lov har fået tillagt beføjelse til at træffe afgørelser på vegne af land eller kommune. Landsstyret kan herunder fastsætte nærmere regler om opbevaring m.v. af dokumenter.

**§ 2.**

For sager om ansættelse eller forfremmelse i det offentliges tjeneste gælder kun bestemmelsen i § 6.

**Stk. 2.** Sager om lovgivning, herunder bevillingslove, er kun omfattet af loven, for så vidt lovforslag er fremsat i lagtinget.

§ 3.

Landsstýrið kann áseta reglur um, at nærri tilskilaðir myndugleikar, málsøkir ella sløg av skjølum, fyri hvørji ásetingarnar í §§ 7-14 vanliga føra við sær, at áheitan um skjalainnlit kann verða noktað, skulu verða undantikin lógini.

**Stk. 2.** Landsstýrið kann áseta reglur um, at tað aftaná eitt ávíst áramál skal vera loyvt at gera seg kunnigan við nærri tilskilaði skjøl, sum ikki koma undir rættin til skjalainnlit sambært reglunum í hesi lóg.

**Kap. 2. Rætturin til skjalainnlit.**

§ 4.

Ein og hvør kann við teimum undantøkum, sum eru nevnd í §§ 7-14, krevja at fáa høvi til at gera seg kunnugan við skjøl, sum ein myndugleiki hevur móttikið ella gjørt sum liður í fyrisitingarligari saksviðgerð í sambandi við virksemi myndugleikans. Ein myndugleiki kann geva loyvi til skjalainnlit í størri mun, um ikki annað fylgir av reglum um tagnarskyldu v.m.

**Stk. 2.** Hann, hvørs persónligu viðurskifti eru umtalað í einum skjali, kann við teimum undantøkum, ið nevnd eru í §§ 7-11 og § 14 krevja, at fáa høvi til, at gera seg kunnigan við upplýsingarnar. Hetta er tó ikki galdandi í tann mun tey fyrilit, ið nevnd eru í § 13, ella umhugsni fyri honum sjálvum, ella øðrum, avgjørt talar ímóti hesum.

**Stk. 3.** Áheitan sambært stk. 1 og 2 skal skila til tey skjøl ella tað mál, sum

§ 3.

Landsstyret kan fastsætte regler om, at nærmere angivne myndigheder, sagsområder, eller arter af dokumenter, for hvilke bestemmelserne i §§ 7-14 i almindelighed vil medføre, at begæring om aktindsigt kan afslås, skal være undtaget fra loven.

**Stk. 2.** Landsstyret kan fastsætte regler om, at der efter et vist åremål skal være ret til at blive gjort bekendt med nærmere angivne dokumenter, der ikke er undergivet retten til aktindsigt efter reglerne i denne lov.

**Kap. 2. Retten til aktindsigt.**

§ 4.

Enhver kan med de undtagelser, der er nævnt i §§ 7-14 forlange at blive gjort bekendt med dokumenter, der er indgået til eller oprettet af en forvaltningsmyndighed som led i administrativ sagsbehandling i forbindelse med dens virksomhed. En forvaltningsmyndighed kan give aktindsigt i videre omfang, medmindre andet følger af regler om tavshedspligt m.v.

**Stk. 2.** Den, hvis personlige forhold er omtalt i et dokument, kan med de undtagelser, der er nævnt i §§ 7-11 og § 14 forlange at blive gjort bekendt med oplysningerne herom. Det gælder dog ikke i det omfang de hensyn, der er nævnt i § 13, eller hensynet til den pågældende selv eller andre med afgørende vægt taler imod.

**Stk. 3.** Begæring efter stk. 1 og 2 skal angive de dokumenter eller den

viðkomandi ynskir at gera seg kunnigan við.

§ 5.

Rætturin til skjalainnlit fevnir um:

1) øll skjøl, ið viðvíkja málinum, herundir makaskjøl av teimum skjølum, sum eru send frá myndugleikanum, tá skrivini mugu haldast at vera komin fram til móttakaran, og

2) innføringar í journalir, skráir og aðrar skrásetingar viðvíkjandi skjølum i avvarðandi máli.

**Stk. 2.** Rætturin til skjalainnlit fevnir ikki um skráir ella aðrar skipaðar skrásetingar, har sum nýtt verður edv, tó burtursæð frá skrásetingum, sum nevndar eru í stk. 1, nr. 2.

**Stk. 3.** Landsstýrið kann áseta reglur um atgongd hjá almenninginum at kunna seg við upplýsingar í edv-skráum v.m., ið ikki eru umfatað av lógini um skráir hjá almennum myndugleikum. Herundir kunnu eisini ásetast reglur um gjald.

**Skylda at skriva upp v.m.**

§ 6.

Í málum, har avgerð fer at verða tikin av einum myndugleika, skal myndugleiki, sum munnliga tekur ímóti upplýsingum viðvíkjandi teimum veruligu unnstøðunum, ið hava týdning fyri avgerðina í málinum, ella sum á annan hátt er kunnigur við sovorðnar upplýsingar, skriva upp innihaldið av teimum.

sag, som den pågældende ønsker at blive gjort bekendt med.

§ 5.

Retten til aktindsigt omfatter:

1) alle dokumenter, der vedrører sagen, herunder genpart af de skrivelser, der er udgået fra myndigheden, når skrivelserne må antages at være kommet frem til adressaten, og

2) indførelser i journaler, registre og andre fortegnelser vedrørende den pågældende sags dokumenter.

**Stk. 2.** Retten til aktindsigt omfatter ikke registre eller andre systematiserede fortegnelser, hvor der gøres brug af elektronisk databehandling, dog bortset fra fortegnelser som nævnt i stk. 1, nr. 2.

**Stk. 3.** Landsstyret kan fastsætte regler om offentlighedens adgang til at blive gjort bekendt med oplysninger i edb-registre m.v., der ikke er omfattet af loven om offentlige myndigheders registre. Der kan herunder fastsættes regler om betaling.

**Notatpligt m.v.**

§ 6.

I sager, hvor der vil blive truffet afgørelse af en forvaltningsmyndighed, skal en myndighed, der mundtligt modtager oplysninger vedrørende en sags faktiske omstændigheder, der er af betydning for sagens afgørelse, eller som på anden måde er bekendt med sådanne oplysninger, gøre notat om indholdet af

Hetta er tó ikki galdandi um upplýsingarnar annars síggjast í skjølunum í málinum.

**Stk. 2.** Landsstýrið kann fyri nærri ásett fyrisitingarøkir áseta reglur um varðveitslu v.m. av fráboðanum, ið eru gjørdar ella móttiknar við edv.

**Stk. 3.** Landsstýrið kann áseta reglur um uppskrivingarskyldu viðvíkjandi nærri ásettum bólkum av málum um útinnan av øðrum fyrisitingarvirksemi enn nevnt í stk. 1.

## Kap. 3. Undantøk frá reglunum um skjalainnlit. Undantøka av innanhýsis arbeiðsskjølum.

### § 7.

Rætturin til skjalainnlit fevnir ikki um innanhýsis arbeiðsskjøl. Innanhýsis arbeiðsskjøl eru:

1) skjøl, sum verða gjørd av einum myndugleika til egna nýtslu
2) brævaskifti millum ymiskar deildir innan fyri sama myndugleika og
3) brævaskifti millum eitt bý- ella bygdaráð og tess nevndir, deildir og aðrar stovnar ella millum hesar stovnar sínámillum.

### § 8.

Rætturin til skjalainnlit fevnir hóast ásetingina í § 7 um innanhýsis arb-

oplysningerne. Dette gælder dog ikke såfremt oplysningerne i øvrigt fremgår af sagens dokumenter.

**Stk. 2.** Landsstyret kan for nærmere angivne områder af forvaltningsvirksomhed fastsætte regler om opbevaring m.v. af meddelelser, der udfærdiges eller modtages ved hjælp af elektronisk databehandling.

**Stk. 3.** Landsstyret kan fastsætte regler om notatpligt for nærmere angivne grupper af sager om udøvelse af anden forvaltningsvirksomhed end nævnt i stk. 1.

## Kap. 3. Undtagelser fra retten til aktindsigt. Undtagelse af interne arbejdsdokumenter.

### § 7.

Retten til agtindsigt omfatter ikke en myndigheds interne arbejdsdokumenter. Som interne arbejdsdokumenter anses:

1) dokumenter, der udarbejdes af en myndighed til eget brug,
2) brevveksling mellem forskellige enheder inden for samme myndighed,
3) brevveksling mellem by- eller bygderåd og dettes udvalg, afdelinger og andre organer eller mellem disse organer indbyrdes.

### § 8.

Retten til aktindsigt omfatter uanset bestemmelsen i § 7 interne arbejdsdo-

eiðsskjøl, ið eru til skjals í endaligum líki, tá

1) skjølini bert endurgeva innihaldið av endaligu støðutakan myndugleikans viðvíkjandi avgerðini í einum máli,
2) skjølini bert innihalda eina endurgeving av upplýsingum, sum myndugleikin hevur havt skyldu til at skriva upp sambært áseting ini í § 6,
3) skjølini eru sjálvstøðug skjøl, ið eru gjørd av einum myndugleika fyri at fáa til vega prógvandi ella annan samsvarandi greidleika viðvíkjandi teim veruligu umstøðunum í einum máli, ella
4) skjølini innihalda almenn stevnumið fyri viðgerðini av ávísum málsløgum.

kumenter, som foreligger i endelig form, når

1) dokumenterne alene gengiver indholdet af myndighedens endelige beslutning vedrørende en sags afgørelse,
2) dokumenterne alene indeholder en gengivelse af oplysninger, som myndigheden har haft pligt til at notere efter bestemmelsen i § 6,
3) dokumenterne er selvstændige dokumenter, der er udarbejdet af en myndighed for at tilvejebringe bevismæssig eller anden tilsvarende klarhed med hensyn til en sags faktiske omstændigheder, eller
4) dokumenterne indeholder generelle retningslinier for behandlingen af bestemte sagstyper.

**§ 9.**

Um sjúkrahúsjournalur er gjørdur um heilsuviðurskiftini hjá einum persóni, hevur hann hóast ásetingina í § 7 rætt til skjalainnlit í journalin.

**Stk. 2.** Rætturin til skjalainnlit kann tó avmarkast í tann mun áhugi partanna í skjalainnliti má metast at ciga at víkja fyri avgerandi umhugsni fyri pørtunum sjálvum ella øðrum privatum áhugamálum.

**§ 9.**

Den, om hvis helbredsforhold der er udarbejdet en sygehusjournal, har uanset bestemmelsen i § 7 ret til aktindsigt i journalen.

**Stk. 2.** Retten til aktindsigt kan dog begrænses i det omfang, partens interesse i aktindsigt findes at burde vige for afgørende hensyn til den pågældende selv eller til andre private interesser.

**Undantøka av øðrum skjølum.**

**§ 10.**

Rætturin til skjalainnlit fevnir ikki um:

1) Gerðabøkur hjá landsstýrinum, frásagnir frá fundum millum lands-

**Undtagelse af andre dokumenter.**

**§ 10.**

Retten til aktindsigt omfatter ikke:

1) landsstyrets protokoller, referater af møder mellem landsstyresmænd

stýrismenn og skjøl, ið verða gjørd av einum myndugleika til nýtslu á sovorðnum fundum.

2) Brævaskifti millum landsstýrismenn um lóggávu, herundir játtanarlógir.

3) Skjøl, sum verða send øðrum myndugleika í samband við, at ein myndugleiki hevur skrivarauppgávuna um hendi fyri ein annan myndugleika.

4) Brævaskifti hjá einum myndugleika við serkøn til nýtslu í rættarmáluun, ella tá støða skal takast til møguligt rættarmál.

5) Tilfar, ið verður útvegað sum grundarlag til gerð av almennum hagtølum ella vísindaligum kanningum.

og dokumenter, der udarbejdes af en myndighed til brug for sådanne møder.

2) Brevveksling mellem landsstyresmænd om lovgivning, herunder bevillingslove.

3) Dokumenter, der udveksles i forbindelse med, at en myndighed udfører sekretariatsopgaver for en anden myndighed.

4) En myndigheds brevveksling med sagkyndige til brug i retssager eller ved overvejelse af, om retssag bør føres.

5) Materiale, der tilvejebringes som grundlag for udarbejdelse af offentlig statistik eller videnskabelige undersøgelser.

**Fráboðan av veruligum upplýsingum.**

**§ 11.**

Upplýsingar í skjølum, ið eru umfatað av § 7 og § 10, nr. 1-4, um vemligar umstøður, sum eru av stórum týdningi fyri málið, skulu hóast hesar ásetingar latast í samsvari við vanligu reglur lógarinnar.

**Stk. 2.** Landsstýrið kann áseta reglur um, at skyldan sambært stk. 1 ikki skal vera galdandi fyri nærri ásettar bólkar av málum um útinnan av veruligum fyrisitingarvirksemi.

**Meddelelse af faktiske oplysninger.**

**§ 11.**

Oplysninger i dokumenter, der er omfattet af § 7 og § 10, nr. 1-4, om faktiske omstændigheder, der er af væsentlig betydning for sagsforholdet, skal uanset disse bestemmelser meddelelses i overensstemmelse med lovens almindelige regler.

**Stk. 2.** Landsstyret kan fastsætte regler om, at pligten efter stk. 1 ikke skal gælde nærmere angivne grupper af sager om udøvelse af faktisk forvaltningsvirksomhed.

## Undantøka av upplýsingum.

### § 12.

Rætturin til skjalainnlit fevnir ikki um upplýsingar um:

1) privatu, herundir fíggjarligu, viðurskiftini hjá einstaklingum,
2) tøkniligar útbúningar ella mannagongdir, ella um rakstrar- ella vinnuviðurskifti ella líknandi um so er, at tað hevur stóran fíggjarligan týdning fyri tann persónin ella virkið, sum upplýsingin viðvíkir, at áheitanin ikki verður gingin á møti.

**Stk. 2.** Um bert ein partur av skjalinum kemur undir ásetingina í stk. 1, skal hann verða kunnaður við hin partin av innihaldinum í skjalinum.

### § 13.

Rætturin til skjalainnlit kann avmarkast í tann mun tað er neyðugt til verju av munandi umhugsni viðvíkjandi:

1) trygd ella verju ríkisins
2) uttanríkispolitiskum ella uttanríkisfíggjarligum álugamálum, herundir viðurskiftini við aðrar tjóðir ella millumtjóða stovnar,
3) fyribyrging, avdúkan og søkjan at lógarbrotum, revsingarfulgerð og líknandi og verju av ákærdum, vitnum ella øðrum í málum um revsi- ella agasókn,
4) fremjing av almennum eftirliti, skipanar- ella ráðleggingarvirksemi ella ætlaðum tiltøkum sambært

## Undtagelse af oplysninger.

### § 12.

Retten til aktindsigt omfatter ikke oplysninger om:

1) enkeltpersoners private, herunder økonomiske, forhold,
2) tekniske indretninger eller fremgangsmåder eller om drifts- eller forretningsforhold eller lignende, for så vidt det er af væsentlig betydning for den person eller virksomhed, oplysningen angår, at begæringen ikke imødekommes.

**Stk. 2.** Omfattes kun en del af et dokument af bestemmelsen i stk. 1, skal den pågældende gøres bekendt med dokumentets øvrige indhold.

### § 13.

Retten til aktindsigt kan begrænses i det omfang, det er nødvendigt til beskyttelse af væsentlige hensyn til:

1) rigets sikkerhed eller forsvar,
2) udenrigspolitiske eller udenrigsøkonomiske interesser, herunder forholdet til fremmede magter eller mellemfolkelige institutioner,
3) forebyggelse, opklaring og forfølgning af lovovertrædelser, straffuldbyrdelse og lignende samt beskyttelse af sigtede, vidner eller andre i sager om strafferetlig eller disciplinær forfølgning,
4) gennemførelse af offentlig kontrol, regulerings- eller planlægningsvirksomhed eller af påtænkte for-

skatta- og avgjaldslóggávuni,

5) fíggjarligu áhugamálunum hjá tí almenna, herundir fremjing av vinnuvirksemi tess almenna ella

6) privatum ella almennum áhugamálum, har tað vegna serligar umstøður í hesum føri er neyðugt at dylja málið.

**Stk. 2.** Um umstøður, sum nevndar í stk. 1 bert gera seg galdandi fyri ein part av einum skjali, skal viðkomandi gerast kunnigur við restina av innihaldinum í skjalinum.

anstalninger i henhold til skatte- og afgiftslovgivningen,

5) det offentliges økonomiske interesser, herunder udførelsen af det offentliges forretningsvirksomhed, eller

6) private og offentlige interesser, hvor hemmeligholdelse efter forholdets særlige karakter er påkrævet.

**Stk. 2.** Gør hensyn som nævnt i stk. 1 sig kun gældende for en del af et dokument, skal den pågældende gøres bekendt med dokumentets øvrige indhold.

### Atlitið til tagnarskyldu.

### § 14.

Skyldan at lata upplýsingar er avmarkað av serstøkum ásetingum um tagnarskyldu, ið eru ásettar við lóg ella við heimild í lóg fyri persónar, ið virka í almennari tænastu ella starvi. Hetta er ikki galdandi viðvíkjandi tí vanligu tagnarskylduni sambært revsilógini, fyrisitingarlógini og tænastumannalóggávuni.

### Forholdet til tavshedspligt.

### § 14.

Pligten til at meddele oplysninger er begrænset af særlige bestemmelser om tavshedspligt fastsat ved lov eller med hjemmel i lov for personer, der virker i offentlig tjeneste eller hverv. Det gælder ikke, for så vidt angår den almindelige tavshedspligt efter straffeloven, forvaltningsloven og tjenestemandslovgivningen.

## Kap. 4. Viðgerðin og avgerðin viðvíkjandi áheitan um skjalainnlit.

### § 15.

Verður áheitan um skjalainnlit sett fram viðvíkjandi skjølum, ið eru partur av máli, har sum tað er ella fer at verða tikin avgerð av einum fyrisitingarmyndugleika, avger hesin myndugleikin, um áheitanin kann verða gingin á møti. Í øðrum førum verður avgerð um skjal-

## Kap. 4. Behandlingen af afgørelsen af begæringer om aktindsigt.

### § 15.

Fremsættes der begæring om aktindsigt vedrørende dokumenter, der indgår i en sag, hvori der er eller vil blive truffet afgørelse af en forvaltningsmyndighed, afgør denne myndighed, om begæringen kan imødekommes. I andre tilfælde afgøres sager om aktindsigt af

ainnlit tikin av tí myndugleika, sum hevur skjalið undir hond.

**Stk. 2.** Avgerðir um spurningar um skjalainnlit kunnu kærast framíhjá til tann myndugleika, sum er kærustovnur viðvíkjandi avgerðini ella viðgerðini annars av tí máli, sum áheitanin um skjalainnlit viðvíkir.

**Stk. 3.** Landsstýrið kann áseta reglur, ið frávíkja reglunum í stk. 1 og 2.

### § 16.

Viðkomandi myndugleiki ger sum skjótast av, um ein áheitan um skjalainnlit kann verða gingin á møti, og um hann, sum er komin við áheitanini skal verða gjørdur kunnugur við skjøl soleiðis, at hann fær høvi til at síggja tey á staðnum ella soleiðis, at hann fær eitt avrit ella makaskjal.

**Stk. 2.** Er ein áheitan um skjalainnlit ikki gingin á møti ella noktað innan 10 dagar eftir, at viðkomandi myndugleiki hevur móttikið hana, skal myndugleikin boða viðkomandi frá, um orsøkina til hetta, og nær ein avgerð væntandi verður til skjals.

**Stk. 3.** Landsstýrið ásetir reglur um gjald fyri avrit ella makaskjøl.

## Kap. 5. Gildiskoma, atlitið til aðra lóggávu v.m.

### § 17.

Lógin kemur í gildi 1. januar 1993.

**Stk. 2.** Lógin er ikki galdandi fyri skjøl, sum ein myndugleiki hevur gjørt, ella sum eru komin einum myndugleika í hendi áðrenn 1. januar 1993.

den myndighed, der har dokumentet i sin besiddelse.

**Stk. 2.** Afgørelser om aktindsigtsspørgsmål kan påklages særskilt til den myndighed, som er klageinstans i forhold til afgørelsen eller behandlingen i øvrigt af den sag, begæringen om aktindsigt vedrører.

**Stk. 3.** Landsstyret kan fastsætte bestemmelser, der fraviger reglerne i stk. 1 og 2.

### § 16.

Vedkommende myndighed afgør snarest, om en begæring kan imødekommes, og om den, der har fremsat begæringen, skal gøres bekendt med dokumenterne ved, at der gives adgang til gennemsyn på stedet, eller ved, at der udleveres en afskrift eller kopi.

**Stk. 2.** Er en begæring om aktindsigt ikke imødekommet eller afslået inden 10 dage efter, at den er modtaget af vedkommende myndighed, skal myndigheden underrette den begærende om grunden hertil samt om, hvornår en afgørelse kan forventes at foreligge.

**Stk. 3.** Landsstyret fastsætter regler om betaling for afskrifter og kopier.

## Kap. 5. Ikrafttræden, forholdet til anden lovgivning m.v.

### § 17.

Loven træder i kraft 1. januar 1993.

**Stk. 2.** Loven gælder ikke for dokumenter, der er udfærdiget af en myndighed eller som er kommet i en myndigheds besiddelse inden 1. januar 1993.

Upplýsingar um veruligar umstøður, ið eru at finna í tílíkum skjølum, eru tó umfataðar av rættinum til skjalainnlit sambært reglunum í hesi lóg, um so er, at skjølini eru komin til eitt mál, sum er ella hevur verið til viðgerðar hjá einum fyrisitingarmyndugleika aftaná nevnda dag, og upplýsingarnar eru ella hava verið av týdningi fyri málið. Ásetingin í § 8, nr. 4 er galdandi fyri skjøl, ið verða nýtt aftaná, at lógin er komin í gildi. Ásetingin í § 9 er galdandi fyri sjúkrahúsjournalar, ið eru gjørdar aftaná, at lógin er komin í gildi, og er eisini galdandi fyri tað, sum er skrivað í verandi journalar aftaná, at lógin er komin í gildi. Høvið til skjalainnlit sambært § 1, stk. 2 er ikki galdandi fyri skjøl, ið eru gjørd av ella eru komin til tey í ásetingini nevndu feløg, stovnar, felagsskapir v.m., áðrenn lógin er komin í gildi.

**Stk. 4.** Ásetingar í øðrum lógum um høvi til at kunna seg við skjøl hjá almennu fyrisitingini vera í gildi, hóast tær geva teprari rætt til skjalainnlit enn henda lóg.

Oplysninger om faktiske omstændigheder, der indeholdes i sådanne dokumenter, er dog omfattet af retten til aktindsigt efter reglerne i denne lov, hvis dokumenterne er indgået i en sag, der er eller har været under behandling af en forvaltningsmyndighed efter det nævnte tidspunkt, og oplysningerne er eller har været af betydning for sagen. Bestemmelsen i § 8, nr. 4 gælder for dokumenter, der anvendes efter lovens ikrafttræden. Bestemmelsen i § 9 gælder for sygehusjournaler oprettet efter lovens ikrafttræden og for tilførsler til eksisterende journaler, der er foretaget efter lovens ikrafttræden. Adgangen til aktindsigt efter § 1, stk. 2 gælder ikke for dokumenter, der er udfærdiget af eller er indkommet til de i bestemmelsen nævnte selskaber, institutioner, foreninger m.v. før lovens ikrafttræden.

**Stk. 4.** Bestemmelser i andre love om adgang til at blive gjort bekendt med dokumenter hos den offentlige forvaltning opretholdes, uanset om de giver ret til aktindsigt i snævrere omfang end denne lov.

## Viðmerkingar

Í 1987 heitti Føroya Blaðmannafelag á landsstýrið um at seta í gildi løgtingslóg um innlit í fyrisitingina. Hetta uppskot bygdi á gomlu donsku lógina um almenn innlit í fyrisitingina. Henda lóg fór úr gildi í Danmark 1. januar 1987, tá hon var avloyst av einari nýggjari lóg um innlit í fyrisitingina og einari lóg um fyrisiting, sum báðar hingu saman.

Í 1990 varð málið framlagt í løgtinginum av sjálvstýrisflokkinum. Landsstýrið førdi tá fram, at arbeitt varð í landsstýrinum við hesum spurningi, og samtykti løgtingið at áleggja landsstýrinum at leggja fram lógaruppskot um innlit í fyrisitingina.

Tá landsstýrið fór í holt við at gera reglur fyri økið almenn fyrisiting, varð mett, at best var at fáa reglur fyri alt økið, tí hóast hetta óivað førir nakað meirarbeiði við sær, so verður trygdin hjá borgarunum nógv betur, og sleppur fyrisitingin frá nógvum ivaspurningum, tí klárar reglur koma á økinum.

Fyriliggjandi uppskot, t.e. uppskot til løgtingslóg um fyrisiting og uppskot til løgtingslóg um innlit í fyrisitingina, eru samantengd soleiðis, at ikki ber til at samtykkja annað, men ikki hitt.

Uppskotini líkjast nógv danskari lóggávu á økinum, men er hetta tilætlað, tí stórt sæð hava vit sama fyrisitingarliga siðaarv sum danir, og eru hesar báðar lógirnar í mongum førum bert ein niðurskriving av tí, sum longu er galdandi uttan skrivaðar reglur. Eisini kunnu danskar løgfrøðiligar bókmentir á økinum vera til stóra hjálp, tá tulkingarpurningar koma fyri.

Um hesar lógirnar verða settar í gildi, fara tær at verða eitt gott grundarlag undir arbeiðinum hjá einum møguligum komandi løgtingsins umboðsmanni.

Viðlagt fylgja ummælir til lógaruppskotið frá Føroya Blaðmannafelag, Sjónvarpi Føroya, Útvarpi Føroya, Føroya Kommunufelag og Sjúkrahússtjóranum. (Skjal 1-5).

## Lóg um innlit í fyrisitingina.

Í lógini eru tær vanligu reglurnar um høvi hjá almenninginum at kunna seg við skjøl, ið eru komin til ein fyrisitingarmyndugleika, ella sum ein fyrisitingarmyndugleiki hevur gjørt, sum liður í fyrisitingarligari málsviðgerð í samband við virksemið hjá myndugleikanum. Lógin er galdandi fyri øll, ið ynskja at kunna seg við ávís skjøl ella skjøl í nærri tilskilaðum málum, herundir eisini hann, sum er partur í málinum, hóast hesin eisini sambært reglunum í kap. 4 í uppskotinum um fyrisitingarlóg í størri mun hevur høvi til at gera seg kunnugan við skjøl.

Uppskotið um innlit í fyrisitingina fevnir um alt virksemi hjá almennu fyrisitingini, herundir veruligt (faktiskt) fyrisitingarvirksemi, meðan uppskotið til fyrisitingarlóg viðvíkjandi innliti partanna bert fevnir um mál, har ein fyrisitingarmyndugleiki hevur ella fer at taka avgerð.

Sostatt kann bert fáast innlit í skjøl um veruligt fyrisitingarvirksemi sambært reglunum í uppskotinum til lóg um innlit í fyrisitingina.

Uppskotið viðger einans spurningin um skyldu hjá fyrisitingini at geva skjalainnlit. Myndugleikin kann sostatt veita skjalainnlit í størri mun enn uppskotið gevur, um so er, at annað ikki fylgir av reglunum um tagnarskyldu v.m.

Uppskotið sigur einki um, hvussu almenningurin kann nýta upplýsingar, sum eru fingnar til vega við heimild í lógini, men byggir uppskotið á tað sjónarmið, at tilfarið eisini kann almannakunngerast um ikki reglurnar í aðrari lóggávu sum undantak fyrða hesum. Vanliga fara skerjingar í høvinum at almannakunngera

upplýsingarnar einans at kunna stuðlast á reglurnar um ónáðir og æruskemming ella reglurnar um skemming av upphavsarætti.

Uppskotið fevnir um **alla almennu fyrisitingina,** t.v.s. bæði landsfyrisitingina og kommunalu fyrisitingina og eisini um fyrisitingarmyndugleikar, ið ikki kunnu sigast at hoyra til teir vanligu fyrisitingarmyndugleikarnar, serstakliga nevndir ella ráð. Eisini er lógin galdandi fyri interkommunalar stovnar sum SEV og IRF.

Lógin er galdandi fyri **alt virksemi** hjá almennu fyrisitingini. Høvi til skjalainnlit fevnir sostatt ikki bert um skjøl í málum, har myndugleikarnir fara at taka avgerð mótvegis boargarunum, men eisini um skjøl í málum um gerð av almennum rættarreglum og skjølum, ið verða viðgjørd í samband við annað alment virksemi, herundir sokallað veruligt fyrisitingarvirksemi sum t.d. ferðsla, undirvísing, heilsuverk og byggivirksemi.

Talan skal tó altíð vera um skjøl, ið fáa ella hava fingið eina fyrisitingarliga málsviðgerð. Sostatt koma ikki skjøl, ið einans vera goymd ella send víðari undir lógina, og soleiðis er lógin heldur ikki galdandi fyri skjøl, ið klárt eru send myndugleikanum av misgávum, og myndugleikin ikki nýtir tey.

Lógin er ikki galdandi fyri mál um setan í starv ella flytan í høgri starv í almennari tænastu, og viðvíkjandi lóggávumálum er lógin bert galdandi tá lógaruppskot er framlagt í løgtinginum.

Høvuðsreglan í lógini er, at **øll skjøl** koma undir lógina, og eisini innføringar í journalar, skráir og aðrar skrásetingar viðvíkjandi skjølunum í avvarðandi máli. Rætturin til skjalainnlit fevnir tó sambært § 5, stk. 2, ikki um skráir ella aðrar skipaðar skrásetingar, har sum nýtt verður edv, tó burtursæð frá skrásetingum viðvíkjandi skjølunum í einum máli.

Í málum, har ein fyrisitingarmyndugleiki fer at taka avgerð, skal hann, tá hann fær munnligar upplýsingar, ið eru av týdningi fyri avgerðina í málinum, skriva upp um innihaldið av upplýsingunum. Hetta er eisini galdandi tá myndugleikin á annan hátt verður kunnigur við sovorðnar upplýsingar. Skyldan at skriva upp er tó ikki galdandi, um upplýsingarnar annars framganga av skjølunum í málinum.

Í kap. 3 er ásett ein røð av undantøkum frá rættinum til skjalainnlit. Umframt tey serligu sløgini av skjølum, ið nevnd eru í § 10, eru øll innanhýsis arbeiðsskjøl hjá einum myndugleika sum høvuðsregla undantikin skjalainnliti. Sambært § 8 er hetta tó ikki galdandi fyri nærri fyrisett arbeiðsskjøl, ið fyriliggja í endaligum líki. Sambært § 9 hvur eisini hann, um hvørs heilsuviðurskifti sjúkrahúsjournalur er gjørdur hóast ásetingina í § 7 um innanhýsis arbeiðsskjøl rætt til skjalainnlit í journalin.

Upplýsingar í innanhýsis arbeiðsskjølum og í teimum skjølum, sum § 10 fevnir um, og sum viðvíkja veruligu umstøðunum í einum máli, koma tó undir skjalainnlit sambært § 11, stk. 1, um so er, at upplýsingarnar eru av stórum týdningi fyri málið.

Sambært ásetingini í § 12 kunnu ávísar upplýsingar um privatu og fíggjarligu viðurskiftini hjá einstaklingum og felǿgum verða undantikin skjalainnliti. Eisini er sambært § 13 ein serligur møguleiki fyri at avmarka skjalainnlitið, um tað er neyðugt fyri at verja munandi umhugsni viðvíkjandi einari røð av nærri ásettum almennum ella privatum áhugamálum. Eisini er sambært § 13, stk. 1, nr. 6 møguleiki fyri at undantaka skjøl frá skjalainnliti, um tað er neyðugt fyri at verja serligt umhugsni fyri privatum ella almennum áhugamálum, har dyljan vegna serligu umstøðurnar í málinum ger tað neyðugt.

Sambært § 14 verður rætturin til skjalainnlit einans avmarkaður av serligum ásetingum um tagnarskyldu, t.v.s. serstakliga ásetingar, har tað verður ásett ein víðkað tagnarskylda í mun til reglurnar um tagnarskyldui revsilógini.

Í kapittul 14 eru ásettar nærri reglur um viðgerðina og avgerðina viðvíkjandi áheitan um skjalainnlit. Kemur áheitan um skjalainnlit í einum máli, har ein myndugleiki skal taka avgerð, er tað tann myndugleiki, sum skal taka avgerðina, ið skal avgera spurningin um skjalainnlit. Í øðrum førum er tað tann myndugleiki, ið hevur skjalið, sum skal taka avgerðina. Eisini verður Í § 15, stk. 2 ásett, at ein avgerð um skjalainnlit kann kærast framíhjá til tann myndugleika, sum er kærustovnur í mun til avgerðina ella viðgerðina annars í tí máli, áheitanin um skjalainnlit viðvíkur.

í § 16 er ásett, at áheitanin um skjalainnlit eigur at verða avgjørd sum skjótast. Um ein áheitan um skjalainnlit ikki er gingin á møti ella noktað innan 10 dagar eftir, at viðkomandi myndugleiki hevur móttikið hana, skal myndugleikin sambært § 16, stk. 2 boða viðkomandi frá orsøkini til hetta, og um nær ein avgerð kann væntast at fyriliggja.

Landsstýrið væntar, at lógin skuldi kunna verið sett í gildi 1. januar 1993.

*Til Føroya Landsstýri*

*att. Marita Petersen,*
*landsstýriskona.*

**Viðvíkjandi uppskoti um lóg um innlit í fyrisitingina.**

Eitt sindur sein á veg, men her eru okkara viðmerkingar til uppskotið um lóg um innlit í fyrisitingina.

Eru onkrir aðrir spurningar, sum tygum vilja hava viðmerkingar til, eru vit altíð tilreiðar.

Vónandi taka tit okkara viðmerkingar í álvara, tí ivaleyst verða tað fyrst og fremst tíðindafólk, sum fara at brúka tey amboð, sum ein nýggj lóg gevur heimild til.

*Føroya Blaðmannafelag*

*Viðvíkjandi uppskoti um lóg um innlit í fyrisitingina.*
Føroya Blaðmannafelag takkar fyri høvi at gera viðmerkingar til uppskotið til lóg um innlit í fyrisitingina.

Vit halda, at hetta uppskotið er eitt stórt fet á rættari leið í eini roynd at lata fyrisitingina upp og á tann hátt geva borgaranum og skattgjaldaranum álit á fyrisitingina.

Vit hava lisið uppskotið ígjøgnum og gera hesar viðmerkingar:

**Viðv. § 1. stk. 2.**
Tá tað almenna er við í nógvum fyritakssemi í Føroyum, átti at verið tilskilað í lógini, hvørji eru umfatað av lógini.

Hvussu við Hitafeløgum, brennistøðum, hálvalmennum feløgum, partafeløgum og lutafeløgum, sum tað almenna er við í? Flakavirki við almennum peningi? Grunnar við almennum fæi?

**Viðv. § 2. stk. 1.**
Hví er § 2 broytt samanborið við donsku lógina?

**Viðv § 4. stk. 3.**
Júst hendan greinin er tann, sum vit hava størstu atfinningar ímóti. Í donsku lógini var upprunaliga ætlanin, at óncyðugt skuldi vera at kenna málið frammanundan. Av serligum politiskum ávum var tað fyribils útsett í donsku lógini. Vit halda, at tað er umráðandi, at føroyska lógin eisini tekur postlistarnar við. Tí átti ein grein at nevnt, at eftir eitt ella tvey ár hevur fyrisitingin skyldu at gera postlistar, sum eru umfatað av hesi lóg. Fyri tíðindafólk hevur tað stóran týdning at kunna fylgja við í fyrisitingini. Ein vakin og áboyrgdarfull tíðindatænasta stuðlar fólkaræðinum og gevur skattgjaldarunum álit á, at hansara peningur ikki verður misrøktur í fyrisitingini.

**Viðv. § 10. stk. 1.**
Sum føroyska fyrisitingin er bygd upp, er landsstýrið og fíggjarnevndin ein partur av dagligu fyrisitingini. Tí eigur lógin eisini at umfata gerðabøkurnar hjá Landsstýrinum og fíggjarnevndini – sjálvandi við teimum avmarkingum, sum annars eru nevndar í lógini.

Sum dømi um at pressan ikki rópar persónlig viðurskifti út um allar geilar, eru rættarlistarnir. Um pressan ikki tók sína uppgávu í álvara, kundi hon dagliga skriva nøvnini á øllum sprittbilistum og ferðsyndarum, men ongin partur av pressuni ger tað, tað er júst eitt dømi um, at vit kenna okkara støðu í samfelagnum.

**Viðv. § 12. stk. 2.**
"økonomisk" er dottið burtur í donsku orðingini.

**Viðv. § 15.**
Her stingur trupulleikin seg upp, at vit ikki hava nakran løgtingsins umboðsmann, sum kærast kann til, tá umsókn um alment innlit verður víst aftur.

Kanska ber til fyribils at gera ein kærustovn, sum tekur sær av kærumálum. Ber tað til, er eisini neyðugt at seta tíðarfreist á hjá einum slíkum kærustovni.

**Viðv. § 16. stk. 2.**
Hóast ætlanin eisini er at samtykkja eina nýggja fyrisitingarlóg, skjóta vit upp, at tað beinleiðis stendur í lógarorðingini, at tí sum sýtt verður alment innlit, kann krevja eina skrivliga grundgeving.

Í lógarorðingini stendur "nær ein avgerð væntandi verður til skjals". Hetta gevur møguleika fyri at seinka einum fyrispurningi óneyðuga nógv. Eins og danska lógin greitt sigur, at tann, sum hevur spurt um alment innlit, skal hava at vita nær hann kann fáa svar, solciðis eigur eisini at vera í Føroyum.

**Viðv. § 17. stk. 2.**
Her er ein misskiljing komin í. Her verður sagt, at lógin ikki skal umfata skjøl, sum eru komin einum myndugleika í hendi eftir at lógin er komin í gildi. Hetta kann ikki verða rætt. Sjálvandi eiga tíðindafólk at hava møguleika at hyggja aftur í tíðina.

Í Danmark var ein onnur lóg um alment innlit galdandi áðrenn nr. 572 af 19. december 1985 kom í gildi. Tí kundu tey í Danmark seta treytina um, at lógin ikki umfataði skjøl, sum vóru eldri. Tá høvdu tey havt eina aðra lóg, sum hevði verið galdandi og hana kundu bæði tíðindafólk og onnur brúka fyri at fáa innlit í eldri skjøl. Í Føroyum hevur ongin lóg verið, tí er neyðugt at gera skilabetri skiftisreglur. Á sama hátt, sum § 11 ásetur, at lógin umfatar veruligar upplýsingar, sum eru í skjølum. ið annars ikki eru umfataði av lógini, á sama hátt ber til at gera eina grein, sum setur hurðina á glopp ella eitt sindur meiri til skjøl, sum eru eldri enn tann dagin, lógin kemur í gildi.

**Niðurstøða:**
Samanumtikið er hetta óført, men ein lóg broytir onki uttan so at málini í henni verða fylgd. Tí skjóta vit upp, at í viðmerkingunum verður sagt eitt sindur nærri, hvat endamálið við lógini er.

Annars vísa vit á trí ggjar viðmerkingar, sum eru tær týdningarmestu.

1) Tíðarfreist og lyfti um opnar postlistar.
2) Kærumøguleikar, sum geva lógini veruligt virði.
3) Hurðin má setast á glopp til skjøl, sum eru eldri enn tann dagin lógin kemur í gildi.

*Vinarliga*
*Føroya Blaðmannafelag*

*Viðmerkingar til uppskot um lóg um alment innlit.*
Sjónvarp Føroya hevur hesar viðmerkingar til landsstýrisins uppskot um lóg um alment innlit.

Sum almennur stovnur metir SVF seg at vera ein av teimum stovnum, lógin fevnir um. Til hendan part hevur SVF ongar viðmerkingar.

Sum fjølmiðil hevur SVF hinvegin í samband við programgerð stóran áhuga í at ein slík lóg verður samtykt og sett í verk, og at hendan lóg virkar væl. Sum heild er tað eitt framstig, at almenningurin við einari tílíkari lóg fær innlit í fyrisitingina.

SVF metir, at lógin í vissan mun eigur at vera meira víðgongd enn uppskot landsstýrisins. Til dømis er tað ein stórur fyrimunur, um almenningurin kann fylgja við í hvørji mál eru til viðgerðar – einahelst í landsumsitingini.

Í grein 4, stk. 3, stendur, at tann sum ynskir innlit, skal vita hvat málið snýr seg um, og viðkomandi skal eisini tilskila, hvørji skjøl ynski er um at síggja. SVF metir, at hendan grein ger tað ógvuliga torført at brúka lógina. Mælt verður til, at høvi verður at fáa at vita, hvørji mál eru til viðgerðar og hvørjar avgerðir verða tiknar. Vísast kann til, at í grannalondum okkara hava fjølmiðlarnir atgongd til listar yvir inn- og útgangandi post hjá umsitingini.

Arbeiðsøkið hjá løgtingsins fíggjarnevnd er munandi broytt. Eftir okkara meting luttekur fíggjarnevndin í ávísan mun í umsitingini. Tí eigur almenningur eisini at fáa innlit í tann partin av arbeiðinum hjá fíggjarnevndini. Vit mæla eisini til at lógin fevnir um gerðabøkur landsstýrisins.

Í grein 7, stk. 2, verður tosað um brævaskifti millum ymsar deildir hjá sama myndugleika. Her eigur at staðfestast hvat "sami myndugleiki" er.

Avgerandi fyri lógina er kærumøguleikin. SVF metir ikki, at lógin fer at virka til fulnar uttan so, at kærumøguleiki er, og at hesin kærustovnur er óheftur at almennu fyrisitinginni. Skotið verður upp, at ein slíkur kærustovnur verður settur á stovn – møguliga ein "umboðsmaður".

Sjónvarp Føroya tekur undir við lógaruppskotinum við nevndu broytingum. Royndir aðrastaðni vísa, at ein slík lóg gagnar bæði fyrisiting og almenningi.

*Vinarliga*
*Sjónvarp Føroya*

*Viðv. lóg um innlit í fyrisitingina.*
Vísandi til skriv landsstýrisins, dagf. 28. mai 1991, skulu vit siga frá, at vit hava fylgjandi viðmerkingar til uppskotið til lóg um innlit í fyrisitingina:

Áhugamál útvarpsins í sambandi við reglur um innlit í fyrisitingina eru í tveimum. Í fyrsta lagi fara reglurnar um innlit eftir uppskotinum eisini at galda fyri fyrisitingina hjá útvarpinum. Til henda partin hava vit ongar viðmerkingar.

Í øðrum lagi er áhugamál útvarpsins í sambandi við programmvirksemi at gera nýtslu av rættinum til at fáa innlit í fyrisitingina.

Sum heild halda vit, at tað er eitt framstig, at vit fáa eina lóg um innlit í fyrisitingina, men eftir okkara meting eigur lógin at vera meira víðgongd, so møguleikar eisini verða fyri at hava innlit í hvørji mál eru til viðgerðar t.d. í landsfyrisitingini.

Eftir grein 4, stk. 3 skal tann, ið biður um innlit, tilskila hvørji mál og hvørji skjøl hann ynskir at gera seg kunnugan við. Vit skilja hesa reglu soleiðis, at tann, sum biður um innlit, skal frammanundan vita, at tað finst eitt ávíst mál, og at tað finst eitt ávíst skjal. Hugsast kann, at myndugleikar fara at krevja av tí, ið biður um innlit, at viðkomandi í ávísan mun skal lýsa tað tilfar, sum biðið verður um.

Henda regla er sera avmarkandi, og eigur at verða broytt, so møguleikar eisini eru fyri at fáa innlit í, hvørji mál eru til viðgerðar, hvørjar avgerðir verða tiknar o.s.fr. Í Noregi og Svøríki t.d. hava fjølmiðlarnir atgongd til postlistarnar hjá ráðstovunum.

Eftir grein 10, stk. 1. eru gerðabøkur landsstýrisins millum tey skjøl, sum eru undantikin regluni um innlit. Eftir okkara meting, eigur at verða loyvt at fáa innlit í gerðabøkur landsstýrisins.

Eftir uppskotinum fara reglurnar um innlit ikki at fevna um fíggjarnevndina, men hóskandi hevði verið, at loyvt verður at fáa innlit í tann partin av arbeiðinum hjá fíggjarnevndini, sum viðvíkur umsiting av løgtingssamtyktum.

Eftir grein 7, stk. 2 er brævaskifti millum ymsar deildir innanfyri sama myndugleika at rokna sum innanhýsis arbeiðsskjøl. Tað hevur týdning, hvussu henda regla verður tulkað. Verður t.d. alt sjúkrahúsverkið roknað sum ein myndugleiki?

Í grein 16, stk. 2 eru reglur um, hvussu skjótt ein áheitan um skjalainnlit skal avgreiðast. Innan fjølmiðlarnar verður at kalla altíð arbeitt í skundi, og tí eigur henda greinin at verða neyvari orðað, so lógin ástetir, at umbøn um skjalainnlit skal gangast á møti skjótast gjørligt og uttan óneyðugt drál.

Í grein 15, stk. 2 eru reglur um kærumøguleikar. Eftir okkara meting er neyðugt við munandi neyvari reglum um kærumøguleikarnar. Tað eigur altíð at verða møguligt at kæra, um ein myndugleiki sýtir innlit, og tað eigur altíð at verða heilt greitt hvør kærumyndugleikin er.

Reglurnar um kærumøguleikar eru avgerandi fyri, hvussu stórt virði lógin fær, og okkara uppskot er, at settur verður ein kærumyndugleiki, sum er óheftur av øllum fyrisitingarmyndugleikum.

Sum heild meta vit, at tað er eitt stórt framstig, at vit fáa eina lóg um innlit, og vit mæla til, at lógin verður so fullfíggjað sum gjørligt frá byrjan, tí royndirnar í Danmark vísa, at tað tekur drúgva tíð at fáa endurskoðað eina lóg, sum bert er ætlað sum ein fyribilsloysn.

*Vinarliga*
*Útvarp Føroya*

*Viðv. Uppskotinum um innlit í almenna fyrisiting. (J. nr. 666-1/91).*

Felagið hevur ongar viðmerkingar til uppskotið.

*Fyri felagið*
*Jens M. Dalsgaard, skr.*

*Viðv. uppskotinum um innlit í almenna fyrisiting.*

Vísandi til skriv F.L. j. nr. 666-1/91, dagfest 28. mei 1991, har uppskot til løgtingslóg um innlit í almenna fyrisiting og uppskot til løgtingslóg um fyrisiting er sent sjúkrahúsverkinum til ummælis, skal verða sagt frá, at sjúkrahúsverkið sær onki til hindurs fyri at seta nevndu lógir í gildi.

Sjúkrahúsverkið hevði sæð tað sum eitt framstig, um nevndu lógir vórðu settar í gildi. Tað kann nevnast, at innan sjúkrahúsverkið verða stórir partar av nevndu lógum longu praktiseraðir. T.d. hevur sjúkrahúsverkið avgjørt at geva øllum sjúklingum innlit í egnar sjúkrajournalir, hóast hetta ikki er álagt sjúkrahúsverkinum.

Vísandi til omanfyri standandi skal sjúkrahúsverkið tí mæla til, at nevndu lógir verða settar í gildi í Føroyum.

*Høgni Joensen*

## Álit

í

*løgtingsmáli nr. 183/1992: Fyrisitingarlóg. (92/91)*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 20. februar 1992 og eftir 1. viðgerð 26. februar 1992 beint í rættarnevndina.

Felagsálit fyri løgtingsmálini nr. 92/91: Fyrisitingarlóg, nr. 93/91: Lóg um innlit í fyrisitingina og nr. 142/91: Løgtingsins umboðsmaður varð lagt fram tann 1. juni 1992 og varð samtykt, at rættarnevndin skuldi arbeiða víðari við málunum 92, 93 og 142/1991 sum millumtinganevnd og leggja álit fyri løgtingið í ólavsøkutingsetuni.

Nevndin hevur havt fund við avvarðandi embætisfólk í landsstýrinum, skrivstovustjóran og økisfulltrúan til tess at kunna nevndina um gongdina í málunum, at lýsa uppskotið gjølliga og at svara spurningunum.

Nevndin umrøddi tey ummælisskriv, ið viðløgd eru lógaruppskotunum, har Føroya Kommunufelag og Sjúkrahústjórin gera viðmerkingar.

Lógin líkist nógv donsku lóggávuni, og í mongum førum er bert ein niðurskriving av tí, sum longu er galdandi uttan skrivaðar reglur. Eisini kunnu danskar løgfrøðiligar niðurstøður og fordømi á økinum vera til stóra hjálp, tá tulkingarspurningar koma fyri.

Mett varð, at best var at fáa reglur fyri alt økið, tó hóast hetta óivað føra nakað meirarbeiði við sær, so verður trygdin hjá borgarunum nógv betri, og sleppur fyrisitingin frá nógvum ivaspurningum, tí klárar reglur koma á økinum.

Lógin umfatar tí alla almennu fyrisitingina og fevnir sostatt um allar fyrisitingarmyndugleikar, bæði landsmyndugleikar og kommunalar myndugleikar og t.d. serligar nevndir ella ráð ella serstakar stovnar ella almennar grunnar, ið eru settir á stovn við heimild í hesi lóg.

Sum nevnt í viðmerkingunum til lógaruppskotini í nr. 92/91 (183/92) og nr. 93/91 (184/92) er neyðugt at samtykkja báðar lógirnar í senn við sama gildisdegi.

Hesum tekur nevndin undir við og vísir annars til álitið í løgtingsmáli nr. 184/92:

Í lógaruppskotinum, § 32, stendur, at lógin kemur í gildi 1. januar 1993, hetta verður nú broytt til 1. januar 1994, tá so nógv er útliðið. Samsvarandi hesum setir nevndin fram soljóðandi:

**Broytingaruppskot**

**til**

**uppskot landsstýrisins**

| | |
|---|---|
| Í § 32 verður "1. januar 1993" broytt til: "1. januar 1994". | 1 § 32 ændres "1. januar 1993" til: "1. januar 1994". |

## Broytingaruppskot

## til

*3. viðgerð av tingmáli nr. 184/1992: Lóg um innlit í fyrisitingina (93/91).*

Tað hevur stóran týdning, at Føroya fólk við hesi lóg nú fær betri møguleikar at kunna seg og døma um fyrisitingarligar og politiskar avgerðir.

Men í sambandi við lóg um alment innlit, eiga eisini reglur um fjølmiðlasið (pressuetikk) at verða fyrireikaðar og settar í gildi. Tí við øktum innliti fylgir økt ábyrgd og fólk hava krav uppá, at verða vernd.

Til tess at tryggja hesum, verður sett fram soljóðandi:

## Uppskot

## til

## samtyktar

Landsstýrinum verður álagt at fyrireika og seta í gildi hóskandi reglur um fjølmiðlasið (pressuetikk).

# 184. Lóg um innlit í fyrisitingina (93/91)

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um innlit í fyrisitingina.*

*lagtingslov om offentlighed i forvaltningen.*

**Kap. 1. Lógarøkið.**

**§ 1.**

Lógin er galdandi fyri alt virksemið hjá almennu fyrisitingini undir heimastýrinum, jbr. tó §§ 2 og 3.

**Stk. 2.** Lógin er eisini galdandi fyri interkommunalar felagsskapir.

**Stk. 3.** Landsstýrið kann áseta reglur um, at lógin skal verða galdandi fyri nærri ásett feløg, stovnar, felagsskapir v.m., sum ikki kunnu roknast til ta almennu fyrisitingina. Hetta er tó bert galdandi, um útreiðslurnar av teirra virksemi í høvuðsheitunum verða rindaðar av landi ella kommunum ella í tann mun, tey við ella sambært lóg hava fingið heimild til at taka avgerð vegna land ella kommunu. Landsstýrið kann herundir áseta nærri reglur um varðveitslu v.m. av skjølum.

**Kap. 1. Lovens område.**

**§ 1.**

Loven gælder for al virksomhed, der udøves af den offentlige forvaltning under hjemmestyret, jfr. dog §§ 2 og 3.

**Stk. 2.** Loven gælder endvidere for interkommunale fællesskaber.

**Stk. 3.** Landsstyret kan fastsætte regler om, at loven skal gælde for nærmere angivne selskaber, institutioner, foreninger m.v., som ikke kan henregnes til den offentlige forvaltning. Det gælder dog kun såfremt udgifterne ved deres virksomhed overvejende dækkes af land eller kommune, eller i det omfang de ved eller i henhold til lov har fået tillagt beføjelse til at træffe afgørelser på vegne af land eller kommune. Landsstyret kan herunder fastsætte nærmere regler om opbevaring m.v. af dokumenter.

**§ 2.**

Fyri mál um setan í starv ella flytan í hægri starv, er bert ásetingin í § 6 galdandi.

**Stk. 2.** Lóggávumál, herundir játtanarlógir, koma bert undir lógina, tá lógaruppskot er framlagt í løgtinginum.

**§ 2.**

For sager om ansættelse eller forfremmelse i det offentliges tjeneste gælder kun bestemmelsen i § 6.

**Stk. 2.** Sager om lovgivning, herunder bevillingslove, er kun omfattet af loven, for så vidt lovforslag er fremsat i lagtinget.

§ 3.

Landsstýrið kann áseta reglur um, at nærri tilskilaðir myndugleikar, málsøkir ella sløg av skjølum, fyri hvørji ásetingarnar í § 7-14 vanliga føra við sær, at áheitan um skjalainnlit kann verða noktað, skulu verða undantikin lógini.

**Stk. 2.** Landsstýrið kann áseta reglur um, at tað aftaná eitt ávíst áramál skal vera loyvt at gera seg kunnugan við nærri tilskilað skjøl, sum ikki koma undir rættin til skjalainnlit sambært reglunum í hesi lóg.

## Kap. 2. Rætturin til skjalainnlit.

§ 4.

Ein og hvør kann við teimum undantøkum, sum eru nevnd í §§ 7-14, krevja at fáa høvi til at gera seg kunnugan við skjøl, sum ein myndugleiki hevur móttikið ella gjørt sum liður í fyrisitingarligari saksviðgerð í samband við virksemi myndugleikans. Ein myndugleiki kann geva loyvi til skjalainnlit í størri mun, um ikki annað fylgir av reglum um tagnarskyldu v.m.

**Stk. 2.** Hann, hvørs persónligu viðurskifti eru umtalað í einum skjali, kann við teimum undantøkum, ið nevnd eru í §§ 7-11 og § 14 krevja, at fáa høvi til at gera seg kunnugan við upplýsingarnar. Hetta er tó ikki galdandi í tann mun tey fyrilit, ið nevnd eru í § 13, ella umhugsni fyri honum sjálvum, ella øðrum, avgjørt talar ímóti hesum.

**Stk. 3.** Áheitan sambært stk. 1 og 2 skal skila til tey skjøl ella tað mál, sum

§ 3.

Landsstyret kan fastsætte regler om, at nærmere angivne myndigheder, sagsområder, eller arter af dokumenter, for hvilke bestemmelserne i § 7-14 i almindelighed vil medføre, at begæring om aktindsigt kan afslås, skal være undtaget fra loven.

**Stk 2.** Landsstyret kan fastsætte regler om, at der efter et vist åremål skal være ret til at blive gjort bekendt med nærmere angivne dokumenter, der ikke er undergivet retten til aktindsigt efter reglerne i denne lov.

## Kap. 2. Retten til aktindsigt.

§ 4.

Enhver kan med de undtagelser, der er nævnt i §§ 7-14 forlange at blive gjort bekendt med dokumenter, der er indgået til eller oprettet af en forvaltningsmyndighed som led i administrativ sagsbehandling i forbindelse med dens virksomhed. En forvaltningsmyndighed kan give aktindsigt i videre omfang, medmindre andet følger af regler om tavshedspligt m.v.

**Stk. 2.** Den, hvis personlige forhold er omtalt i et dokument, kan med de undtagelser, der er nævnt i §§ 7-11 og § 14 forlange at blive gjort bekendt med oplysningerne herom. Det gælder dog ikke i det omfang de hensyn, der nævnt i § 13, eller hensynet til den pågældende selv eller andre med afgørende vægt taler imod.

**Stk. 3.** Begæring efter stk. 1 og 2 skal angive de dokumenter eller den

viðkomandi ynskir at gera seg kunnugan við.

§ 5.
**Rætturin til skjalainnlit fevnir um**

1) øll skjøl, ið viðvíkja málinum, herundir makaskjøl av teimum skjølum, sum eru send frá myndugleikanum, tá skrivini mugu haldast at vera komin fram til móttakaran, og
2) innføringar í journalir, skráir og aðrar skrásetingar viðvíkjandi skjølum í avvarðandi máli.

**Stk. 2.** Rætturin til skjalainnlit fevnir ikki um skráir ella aðrar skipaðar skrásetingar, har sum nýtt verður edv, tó burtursæð frá skrásetingum, sum nevndar eru í stk. 1, nr. 2.

**Stk. 3.** Landsstýrið kann áseta reglur um atgongd hjá almenninginum at kunna seg við upplýsingar í edv-skráum v.m., ið ikki eru umfataðar av lógini um skráir hjá almennum myndugleikum. Herundir kunnu eisini ásetast reglur um gjald.

**Skylda at skriva upp v.m.**

§ 6.
Í málum, har avgerð fer at verða tikin av einum myndugleika, skal myndugleiki, sum munnliga tekur ímóti upplýsingum viðvíkjandi teimum veruligu umstøðunum, ið hava týdning fyri avgerðina í málinum, ella sum á annan hátt er kunnugur við sovorðnar upplýsingar, skriva upp innihaldið av teimum.

sag, som den pågældende ønsker at blive gjort bekendt med.

§ 5.
**Retten til aktindsigt omfatter**

1) alle dokumenter, der vedrører sagen, herunder genpart af de skrivelser, der er udgået fra myndigheden, når skrivelserne må antages at være kommet frem til adressaten, og
2) indførelser i journaler, registre og andre fortegnelser vedrørende den pågældende sags dokumenter.

**Stk. 2.** Retten til aktindsigt omfatter ikke registre eller andre systematiserede fortegnelser, hvor der gøres brug af elektronisk databehandling, dog bortset fra fortegnelser som nævnt i stk. 1, nr. 2.

**Stk. 3.** Landsstyret kan fastsætte regler om offentlighedens adgang til at blive gjort bekendt med oplysninger i edb-registre m.v., der ikke er omfattet af loven om offentlige myndigheders registre. Der kan herunder fastsættes regler om betaling.

**Notatpligt m.v.**

§ 6.
I sager, hvor der vil blive truffet afgørelse af en forvaltningsmyndighed, skal en myndighed, der mundtligt modtager oplysninger vedrørende en sags faktiske omstændigheder, der er af betydning for sagens afgørelse, eller som på anden måde er bekendt med sådanne oplysninger, gøre notat om indholdet af

Hetta er tó ikki galdandi, um upplýsingarnar annars síggjast í skjølunum í málinum.

**Stk. 2.** Landsstýrið kann fyri nærri ásett fyrisitingarøkir áseta reglur um varðveitslu v.m. av fráboðanum, ið eru gjørdar ella móttiknar við edv.

**Stk. 3.** Landsstýrið kann áseta reglur um uppskrivingarskyldu viðvíkjandi nærri ásettum bólkum av málum um útinnan av øðrum fyrisitingarvirksemi enn nevnt í stk. 1.

## Kap. 3. Undantøk frá reglunum um skjalainnlit. Undantøka av innanhýsis arbeiðsskjølum.

### § 7.

Rætturin til skjalainnlit fevnir ikki um innanhýsis arbeiðsskjøl. Innanhýsis arbeiðsskjøl eru

1) skjøl, sum verða gjørd av einum myndugleika til egna nýtslu
2) brævaskifti millum ymiskar deildir innan fyri sama myndugleika og
3) brævaskifti millum eitt bý- ella bygdaráð og tess nevndir, deildir og aðrar stovnar ella millum hesar stovnar sínámillum.

### § 8.

Rætturin til skjalainnlit fevnir hóast ásetingina í § 7 um innanhýsis arbeiðsskjøl, ið eru til skjals í endaligum líki, tá

oplysningerne. Dette gælder dog ikke såfremt oplysningerne i øvrigt fremgår af sagens dokumenter.

**Stk. 2.** Landsstyret kan for nærmere angivne områder af forvaltningsvirksomhed fastsætte regler om opbevaring m.v. af meddelelser, der udfærdiges eller modtages ved hjælp af elektronisk databehandling.

**Stk. 3.** Landsstyret kan fastsætte regler om notatpligt for nærmere angivne grupper af sager om udøvelse af anden forvaltningsvirksomhed end nævnt i stk. 1.

## Kap. 3. Undtagelser fra retten til aktindsigt: Undtagelse af interne arbejdsdokumenter.

### § 7.

Retten til aktindsigt omfatter ikke en myndigheds interne arbejdsdokumenter. Som interne arbejdsdokumenter anses

1) dokumenter, der udarbejdes af en myndighed til eget brug,
2) brevveksling mellem forskellige enheder inden for samme myndighed,
3) brevveksling mellem et by eller bygderåd og dettes udvalg, afdelinger og andre organer eller mellem disse organer indbyrdes.

### § 8.

Retten til aktindsigt omfatter uanset bestemmelsen i § 7 interne arbejdsdokumenter, som foreligger i endelig form, når

1) skjølini bert endurgeva innihaldið av endaligu støðutakan myndugleikans viðvíkjandi avgerðini í einum máli,
2) skjølini bert innihalda eina endurgeving av upplýsingum, sum myndugleikin hevur havt skyldu til at skriva upp sambært ásetingini í § 6,
3) skjølini eru sjálvstøðug skjøl, ið eru gjørd av einum myndugleika fyri at fáa til vega prógvandi ella annan samsvarandi greidleika viðvíkjandi teim veruligu umstøðunum í einum máli, ella
4) skjølini innihalda almenn stevnumið fyri viðgerðini av ávísum málssløgum.

1) dokumenterne alene gengiver indholdet af myndighedens endelige beslutning vedrørende en sags afgørelse,
2) dokumenterne alene indeholder en gengivelse af oplysninger, som myndigheden har haft pligt til at notere efter bestemmelsen i § 6,
3) dokumenterne er selvstændige dokumenter, der er udarbejdet af en myndighed for at tilvejebringe bevismæssig eller anden tilsvarende klarhed med hensyn til en sags faktiske omstændigheder, eller
4) dokumenterne indeholder generelle retningslinier for behandlingen af bestemte sagstyper.

**§ 9.**

Um sjúkrahúsjournalur er gjørdur um heilsuviðurskiftini hjá einum persóni, hevur hann hóast ásetingina í § 7 rætt til skjalainnlit í journalin.

**Stk. 2.** Rætturin til skjalainnlit kann tó avmarkast í tann mun áhugi partanna í skjalainnliti ímá metast at eiga at víkja fyri avgerandi umhugsni fyri partunum sjálvum ella øðrum privatum áhugamálum.

**§ 9.**

Den, om hvis helbredsforhold, der er udarbejdet en sygehusjournal, har uanset bestemmelsen i § 7 ret til aktindsigt i journalen.

**Stk. 2.** Retten til aktindsigt kan dog begrænses i det omfang, partens interesse i aktindsigt findes at burde vige for afgørende hensyn til den pågældende selv eller til andre private interesser.

**Undantøka av øðrum skjølum.**

**§ 10.**

*Rætturin til skjalainnlit fevnir ikki um:*

1) Gerðabøkur hjá landsstýrinum, frásagnir frá fundum millum landsstýrismenn og skjøl, ið verða gjørd av einum myndugleika til nýtslu á sovorðnum fundum.

**Undtagelse af andre dokumenter.**

**§ 10.**

*Retten til aktindsigt omfatter ikke:*

1) Landsstyrets protokoller, referater af møder mellem landsstyresmænd og dokumenter, der udarbejdes af en myndighed til brug for sådanne møder.

2) Brævaskifti millum landsstýrismenn um lóggávu, herundir játtanarlógir.
3) Skjøl, sum verða send øðrum myndugleika í samband við, at ein myndugleiki hevur skrivarauppgávuna um hendi fyri ein annan myndugleika.
4) Brævaskifti hjá einum myndugleika við serkøn til nýtslu í rættarmálum, ella tá støða skal takast til møguligt rættarmál.
5) Tilfar, ið verður útvegað sum grundarlag til gerð av almennum hagtølum ella vísindaligum kanningum.

2) Brevveksling mellem landsstyresmænd om lovgivning, herunder bevillingslove.
3) Dokumenter, der udveksles i forbindelse med, at en myndighed udfører sekretariatsopgaver for en anden myndighed.
4) En myndigheds brevveksling med sagkyndige til brug i retssager eller ved overvejelse af, om retssag bør føres.
5) Materiale, der tilvejebringes som grundlag for udarbejdelse af offentlig statistik eller videnskabelige undersøgelser.

**Fráboðan av veruligum upplýsingum.**

**§ 11.**

Upplýsingar í skjølum, ið eru umfatað av § 7 og § 10, nr. 1-4, um veruligar umstøður, sum eru av stórum týdningi fyri málið, skulu hóast hesar ásetingar latast í samsvari við vanligu reglur lógarinnar.

**Stk. 2.** Landsstýrið kann áseta reglur um, at skyldan sambært stk. 1 ikki skal vera galdandi fyri nærri ásettar bólkar av málum um útinnan av veruligum fyrisitingarvirksemi.

**Meddelelse af faktiske oplysninger.**

**§ 11.**

Oplysninger i dokumenter, der er omfattet af § 7 og § 10, nr. 1-4, om faktiske omstændigheder, der er af væsentlig betydning for sagsforholdet, skal uanset disse bestemmelser meddeles i overensstemmelse med lovens almindelige regler.

**Stk. 2.** Landsstyret kan fastsætte regler om, at pligten efter stk. 1 ikke skal gælde nærmere angivne grupper af sager om udøvelse af faktisk forvaltningsvirksomhed.

**Undantøka av upplýsingum.**

**§ 12.**

*Rætturin til skjalainnlit fevnir ikki um upplýsingar um:*

1) privatu, herundir fíggjarligu, viðurskiftini hjá einstaklingum.

**Undtagelse af oplysninger.**

**§ 12.**

*Retten til aktindsigt omfatter ikke oplysninger om:*

1) enkeltpersoners private, herunder økonomiske, forhold.

2) tøkniligar útbúningar ella mannagongdir, ella um rakstrar- ella vinnuviðurskifti ella líknandi, um so er, at tað hevur stóran fíggjarligan týdning fyri tann persónin ella virkið, sum upplýsingin viðvíkir, at áheitanin ikki verður gingin á møti.

**Stk. 2.** Um bert ein partur av skjalinum kemur undir ásetingina í stk. 1, skal hann verða kunnaður við hin partin av innihaldinum í skjalinum.

2) tekniske indretninger eller fremgangsmåder eller om drifts- eller forretningsforhold eller lignende, for så vidt det er af væsentlig økonomisk betydning for den person eller virksomhed, oplysningen angår, at begæringen ikke imødekommes.

**Stk. 2.** Omfattes kun en del af et dokument af bestemmelsen i stk. 1, skal den pågældende gøres bekendt med dokumentets øvrige indhold.

§ 13.

Rætturin til skjalainnlit kann avmarkast í tann mun, tað er neyðugt til verju av munandi umhugsni viðvíkjandi:

1) trygd ella verju ríkisins
2) uttanríkispolitiskum ella uttanríkisfíggjarligum áhugamálum, herundir viðurskiftini við aðrar tjóðir ella millumtjóða stovnar,
3) fyribyrging, avdúkan og søkjan at lógarbrotum, revsingarfullgerð og líknandi og verju av ákærdum, vitnum ella øðrum í málum um revsi- ella agasókn,
4) fremjing av almennum eftirliti, skipanar- ella ráðleggingarvirksemi ella ætlaðum tiltøkum sambært skatta- og avgjaldslóggávuni,
5) fíggjarligu áhugamálunum hjá tí almenna, herundir fremjing av vinnuvirksemi tess almenna ella
6) privatum ella almennum áhugamálum, har tað vegna serligar um-

§ 13.

Retten til aktindsigt kan begrænses i det omfang, det er nødvendigt til beskyttelse af væsentlige hensyn til:

1) rigets sikkerhed eller forsvar,
2) udenrigspolitiske eller udenrigsøkonomiske interesser, herunder forholdet til fremmede magter eller mellemfolkelige institutioner,
3) forebyggelse, opklaring og forfølgning af lovovertrædelser, straffuldbyrdelse og lignende samt beskyttelse af sigtede, vidner eller andre i sager om strafferetlig eller disciplinær forfølgning,
4) gennemførelse af offentlig kontrol, regulerings- eller planlægningsvirksomhed eller af påtænkte foranstaltninger i henhold til skatte- og afgiftslovgivningen,
5) det offentliges økonomiske interesser, herunder udførelsen af det offentliges forretningsvirksomhed, eller
6) private og offentlige interesser, hvor hemmeligholdelse efter for-

støður í hesum føri er ueyðugt at dylja málið

**Stk. 2.** Um umstøður, sum nevndar í stk. 1, bert gera seg galdandi fyri ein part av einum skjali, skal viðkomandi gerast kunnigur við restina av innihaldinum í skjalinum.

### Atlitið at tagnarskyldu.

### § 14.

Skyldan at lata upplýsingar er avmarkað av serstøkum ásetingum um tagnarskyldu, ið eru ásettar við lóg ella við heimild í lóg fyri persónar, ið virka í almennari tænastu ella starvi. Hetta er ikki galdandi viðvíkjandi tí vanligu tagnarskylduni sambært revsilógini, fyrisitingarlógini og tænastumannalóggávuni.

## Kap. 4. Viðgerðin og avgerðin viðvíkjandi áheitan um skjalainnlit.

### § 15.

Verður áheitan um skjalainnlit sett fram viðvíkjandi skjølum, ið eru partur av máli, har sum tað er ella fer at verða tikin avgerð av einum fyrisitingarmyndugleika, avger hesin myndugleikin, um áheitanin kann verða gingin á møti. Í øðrum førum verður avgerð um skjalainnlit tikin av tí myndugleika, sum hevur skjalið undir hond.

**Stk. 2.** Avgerðir um spurningar um skjalainnlit kunnu kærast framíhjá til tann myndugleika, sum er kærustovnur viðvíkjandi avgerðini ella viðgerðini annars av tí máli, sum áheitanin um skjalainnlit viðvíkir.

holdets særlige karakter er påkrævet.

**Stk. 2.** Gør hensyn, som nævnt i stk. 1, sig kun gældende for en del af et dokument, skal den pågældende gøres bekendt med dokumentets øvrige indhold.

### Forholdet til tavshedspligt.

### § 14.

Pligten til at meddele oplysninger er begrænset af særlige bestemmelser om tavshedspligt, fastsat ved lov eller med hjemmel i lov for personer, der virker i offentlig tjeneste eller hverv. Det gælder ikke, for så vidt angår den almindelige tavshedspligt efter straffeloven, forvaltningsloven og tjenestemandslovgivningen.

## Kap. 4. Behandlingen og afgørelsen af begæringer om aktindsigt.

### § 15.

Fremsættes der begæring om aktindsigt vedrørende dokumenter, der indgår i en sag, hvori der er eller vil blive truffet afgørelse af en forvaltningsmyndighed, afgør denne myndighed, om begæringen kan imødekommes. I andre tilfælde afgøres sager om aktindsigt af den myndighed, der har dokumentet i sin besiddelse.

**Stk. 2.** Afgørelser om aktindsigtsspørgsmål kan påklages særskilt til den myndighed, som er klageinstans i forhold til afgørelsen eller behandlingen i øvrigt af den sag, begæringen om aktindsigt vedrører.

**Stk. 3.** Landsstýrið kann áseta reglur, ið frávíkja reglunum í stk. 1 og 2.

**§ 16.**

Viðkomandi myndugleiki ger sum skjótast av, um ein áheitan um skjalainnlit kann verða gingin á møti, og um hann, sum er komin við áheitanini skal verða gjørdur kunnugur við skjøl soleiðis, at hann fær høvi til at síggja tey á staðnum ella soleiðis, at hann fær eitt avrit ella makaskjal.

**Stk. 2.** Er ein áheitan um skjalainnlit ikki gingin á møti ella noktað innan 10 dagar eftir, at viðkomandi myndugleiki hevur móttikið hana, skal myndugleikin boða viðkomandi frá, um orsøkina til hetta, og nær ein avgerð væntandi verður til skjals.

**Stk. 3.** Landsstýrið ásetir reglur um gjald fyri avrit ella makaskjøl.

**Kap. 5. Gildiskoma, atlitið at aðrari lóggávu v.m.**

**§ 17.**

Lógin kemur í gildi 1. januar 1993.

**Stk. 2.** Lógin er ikki galdandi fyri skjøl, sum ein myndugleiki hevur gjørt, ella sum eru komin einum myndugleika í hendi áðrenn 1. januar 1993. Upplýsingar um veruligar umstøður, ið eru at finna í tílíkum skjølum, eru tó umfataðar av rættinum til skjalainnlit samhært reglunum í hesi lóg, um so er, at skjølini eru komin til eitt mál, sum er ella hevur verið til viðgerar hjá einum fyrisitingarmyndugleika aftan á nevnda dag, og upplýsingarnar eru ella

**Stk. 3.** Landsstyret kan fastsætte bestemmelser, der fraviger reglerne i stk. 1 og 2.

**§ 16.**

Vedkommende myndighed afgør snarest, om en begæring kan imødekommes, og om den, der har fremsat begæringen, skal gøres bekendt med dokumenterne ved, at der gives adgang til gennemsyn på stedet, eller ved, at der udleveres en afskrift eller kopi.

**Stk. 2.** Er en begæring om aktindsigt ikke imødekommet eller afslået inden 10 dage efter, at den er modtaget af vedkommende myndighed, skal myndigheden underrette den begærende om grunden hertil samt om, hvornår en afgørelse kan forventes at foreligge.

**Stk. 3.** Landsstyret fastsætter regler om betaling for afskrifter og kopier.

**Kap. 5. Ikrafttræden, forholdet til anden lovgivning m.v.**

**§ 17.**

Loven træder i kraft 1. januar 1993.

**Stk. 2.** Loven gælder ikke for dokumenter, der er udfærdiget af en myndighed eller som er kommet i en myndigheds besiddelse inden 1. januar 1993. Oplysninger om faktiske omstændigheder, der indeholdes i sådanne dokumenter, er dog omfattet af retten til aktindsigt efter reglerne i denne lov, hvis dokumenterne er indgået i en sag, der er eller har været under behandling af en forvaltningsmyndighed efter det nævnte tidspunkt, og oplysningerne er

hava verið av týdningi fyri málið. Ásetingin í § 8, nr. 4 er galdandi fyri skjøl, ið verða nýtt aftaná, at lógin er komin í gildi. Ásetingin í § 9 er galdandi fyri sjúkrahúsjournalar, ið eru gjørdar aftaná, at lógin er komin í gildi. og er eisini galdandi fyri tað, sum er skrivað í verandi journalar aftaná, at lógin er komin í gildi. Høvið til skjalainnlit sambært § 1, stk. 2 er ikki galdandi fyri skjøl, ið eru gjørd av ella eru komin til tey í ásetingini nevndu feløg, stovnar, felagsskapir v.m., áðrenn lógin er komin í gildi.

**Stk. 3.** Ásetingar í øðrum lógum um høvi til at kunna seg við skjøl hjá almennu fyrisitingini vera í gildi, hóast tær geva teprari rætt til skjalainnlit enn hesa lóg.

eller har været af betydning for sagen. Bestemmelsen i§ 8, nr. 4 gælder for dokumenter, der anvendes efter lovens ikrafttræden. Bestemmelsen i § 9 gælder for sygehusjournaler oprettet efter lovens ikrafttræden og for tilførsler til eksisterende journaler, der er foretaget efter lovens ikrafttræden. Adgangen til aktindsigt efter § 1, stk. 2 gælder ikke for dokumenter, der er udfærdiget af eller er indkommet til de i bestemmelsen nævnte selskaber, institutioner, foreninger m.v. før lovens ikraftræden.

**Stk. 3.** Bestemmelser i andre love om adgang til at blive gjort bekendt med dokumenter hos den offentlige forvaltning opretholdes, uanset om de giver ret til aktindsigt i snævrere omfang end denne lov.

*Til Føroya Landsstýri*

*att. Marita Petersen,*
*landsstýriskona.*

**Viðvíkjandi uppskoti um lóg um innlit í fyrisitingina.**
Eitt sindur sein á veg, men her eru okkara viðmerkingar til uppskotið um lóg um innlit í fyrisitingina.

Eru onkrir aðrir spurningar, sum tygum vilja hava viðmerkingar til, eru vit altíð tilreiðar.

Vónandi taka tit okkara viðmerkingar í álvara, tí ivaleyst verða tað fyrst og fremst tíðindafólk, sum fara at brúka tey amboð, sum ein nýggj lóg gevur heimild til.

*Føroya Blaðmannafelag*

*Viðvíkjandi uppskoti um lóg um innlit í fyrisitingina.*
Føroya Blaðmannafelag takkar fyri høvi at gera viðmerkingar til uppskotið til lóg um innlit í fyrisitingina.

Vit halda, at hetta uppskotið er eitt stórt fet á rættari leið í eini roynd at lata fyrisitingina upp og á tann hátt geva borgaranum og skattgjaldaranum álit á fyrisitingina.

Vit hava lisið uppskotið ígjøgnum og gera hesar viðmerkingar:

**Viðv. § 1. stk. 2.**
Tá tað almenna er við í nógvum fyritakssemi í Føroyum, átti at verið tilskilað í lógini, hvørji eru umfatað av lógini.

Hvussu við Hitafeløgum, brennistøðum, hálvalmennum feløgum, partafeløgum og lutafeløgum, sum tað almenna er við í? Flakavirki við almennum peningi? Grunnar við almennum fæi?

**Viðv. § 2. stk. 1.**
Hví er § 2 broytt samanborið við donsku lógina?

**Viðv § 4. stk. 3.**
Júst hendan greinin er tann, sum vit hava størstu atfinningar ímóti. Í donsku lógini var upprunaliga ætlanin, at óneyðugt skuldi vera at kenna málið frammanundan. Av serligum politiskum ávum var tað fyribils útsett í donsku lógini. Vit halda, at tað er umráðandi, at føroyska lógin eisini tekur postlistarnar við. Tí átti ein grein at nevnt, at eftir eitt ella tvey ár hevur fyrisitingin skyldu at gera postlistar, sum eru umfatað av hesi lóg. Fyri tíðindafólk hevur tað stóran týdning at kunna fylgja við í fyrisitingini. Ein vakin og ábyrgdarfull tíðindatænasta stuðlar fólkaræðinum og gevur skattgjaldarunum álit á, at hansara peningur ikki verður misrøktur í fyrisitingini.

**Viðv. § 10. stk. 1.**
Sum føroyska fyrisitingin er bygd upp, er landsstýrið og fíggjarnevndin ein partur av dagligu fyrisitingini. Tí eigur lógin eisini at umfata gerðabøkurnar hjá Landsstýrinum og fíggjarnevndini – sjálvandi við teimum avmarkingum, sum annars eru nevndar í lógini.

Sum dømi um at pressan ikki rópar persónlig viðurskifti út um allar geilar, eru rættarlistarnir. Um pressan ikki tók sína uppgávu í álvara, kundi hon dagliga skriva nøvnini á øllum sprittbilistum og ferðsyndarum, men ongin partur av pressuni ger tað, tað er júst eitt dømi um, at vit kenna okkara støðu í samfelagnum.

**Viðv. § 12. stk. 2.**
"økonomisk" er dottið burtur í donsku orðingini.

**Viðv. § 15.**
Her stingur trupulleikin seg upp, at vit ikki hava nakran løgtingsins umboðsmann, sum kærast kann til, tá umsókn um alment innlit verður víst aftur.

Kanska ber til fyribils at gera ein kærustovn, sum tekur sær av kærumálum. Ber tað til, er eisini neyðugt at seta tíðarfreist á hjá einum slíkum kærustovni.

**Viðv. § 16. stk. 2.**
Hóast ætlanin eisini er at samtykkja eina nýggja fyrisitingarlóg, skjóta vit upp, at tað beinleiðis stendur í lógarorðingini, at tí sum sýtt verður alment innlit, kann krevja eina skrivliga grundgeving.

Í lógarorðingini stendur "nær ein avgerð væntandi verður til skjals". Hetta gevur møguleika fyri at seinka einum fyrispurningi óneyðuga nógv. Eins og danska lógin greitt sigur, at tann, sum hevur spurt um alment innlit, skal hava at vita nær hann kann fáa svar, soleiðis eigur eisini at vera í Føroyum.

**Viðv. § 17. stk. 2.**
Her er ein misskiljing komin í. Her verður sagt, at lógin ikki skal umfata skjøl, sum eru komin einum myndugleika í hendi eftir at lógin er komin í gildi. Hetta kann ikki verða rætt. Sjálvandi eiga tíðindafólk at hava møguleika at hyggja aftur í tíðina.

Í Danmark var ein onnur lóg um alment innlit galdandi áðrenn nr. 572 af 19. december 1985 kom í gildi. Tí kundu tey í Danmark seta treytina um, at lógin ikki umfataði skjøl, sum vóru eldri. Tá høvdu tey havt eina aðra lóg, sum hevði verið galdandi og hana kundu bæði tíðindafólk og onnur brúka fyri at fáa innlit í eldri skjøl. Í Føroyum hevur ongin lóg verið, tí er neyðugt at gera skilabetri skiftisreglur. Á sama hátt, sum § 11 ásetur, at lógin umfatar veruligar upplýsingar, sum eru í skjølum, ið annars ikki eru umfataði av lógini, á sama hátt ber til at gera eina grein, sum setur hurðina á glopp ella eitt sindur meiri til skjøl, sum eru eldri enn tann dagin, lógin kemur í gildi.

**Niðurstøða:**
Samanumtikið er hetta óført, men ein lóg broytir onki uttan so at málini í henni verða fylgd. Tí skjóta vit upp, at í viðmerkingunum verður sagt eitt sindur nærri, hvat endamálið við lógini er.

Annars vísa vit á tríggjar viðmerkingar, sum eru tær týdningarmestu.

1) Tíðarfreist og lyfti um opnar postlistar.
2) Kærumøguleikar, sum geva lógini veruligt virði.
3) Hurðin má setast á glopp til skjøl, sum eru eldri enn tann dagin lógin kemur í gildi.

*Vinarliga*
*Føroya Blaðmannafelag*

*Viðmerkingar til uppskot um lóg um almennt innlit.*

Sjónvarp Føroya hevur hesar viðmerkingar til landsstýrisins uppskot um lóg um almennt innlit.

Sum almennur stovnur metir SVF seg at vera ein av teimum stovnum, lógin fevnir um. Til hendan part hevur SVF ongar viðmerkingar.

Sum fjølmiðil hevur SVF hinvegin í samband við programgerð stóran áhuga í at ein slík lóg verður samtykt og sett í verk, og at hendan lóg virkar væl. Sum heild er tað eitt framstig, at almenningurin við einari tílíkari lóg fær innlit í fyrisitingina.

SVF metir, at lógin í vissan mun eigur at vera meira víðgongd enn uppskot landsstýrisins. Til dømis er tað ein stórur fyrimunur, um almenningurin kann fylgja við í hvørji mál eru til viðgerðar – einahelst í landsumsitingini.

Í grein 4, stk. 3, stendur, at tann sum ynskir innlit, skal vita hvat málið snýr seg um, og viðkomandi skal eisini tilskila, hvørji skjøl ynski er um at síggja. SVF metir, at hendan grein ger tað ógvuliga torført at brúka lógina. Mælt verður til, at høvi verður at fáa at vita, hvørji mál eru til viðgerðar og hvørjar avgerðir verða tiknar. Vísast kann til, at í grannalondum okkara hava fjølmiðlarnir atgongd til listar yvir inn- og útgangandi post hjá umsitingini.

Arbeiðsøkið hjá løgtingsins fíggjarnevnd er munandi broytt. Eftir okkara meting luttekur fíggjarnevndin í ávísan mun í umsitingini. Tí eigur almenningur eisini at fáa innlit í tann partin av arbeiðinum hjá fíggjarnevndini. Vit mæla eisini til at lógin fevnir um gerðabøkur landsstýrisins.

Í grein 7, stk. 2, verður tosað um brævaskifti millum ymsar deildir hjá sama myndugleika. Her eigur at staðfestast hvat "sami myndugleiki" er.

Avgerandi fyri lógina er kærumøguleikin. SVF metir ikki, at lógin fer at virka til fulnar uttan so, at kærumøguleiki er, og at hesin kærustovnur er óheftur at almennu fyrisitingini. Skotið verður upp, at ein slíkur kærustovnur verður settur á stovn – møguliga ein "umboðsmaður".

Sjónvarp Føroya tekur undir við lógaruppskotinum við nevndu broytingum. Royndir aðrastaðni vísa, at ein slík lóg gagnar bæði fyrisiting og almenningi.

*Vinarliga*
*Sjónvarp Føroya*

*Viðv. lóg um innlit í fyrisitingina.*

Vísandi til skriv landsstýrisins, dagf. 28. mai 1991, skulu vit siga frá, at vit hava fylgjandi viðmerkingar til uppskotið til lóg um innlit í fyrisitingina:

Áhugamál útvarpsins í sambandi við reglur um innlit í fyrisitingina eru í tveimum. Í fyrsta lagi fara reglurnar um innlit eftir uppskotinum eisini at galda fyri fyrisitingina hjá útvarpinum. Til henda partin hava vit ongar viðmerkingar.

Í øðrum lagi er áhugamál útvarpsins í sambandi við programmvirksemi at gera nýtslu av rættinum til at fáa innlit í fyrisitingina.

Sum heild halda vit, at tað er eitt framstig, at vit fáa eina lóg um innlit í fyrisitingina, men eftir okkara meting eigur lógin at vera meira viðgongd, so møguleikar eisini verða fyri at hava innlit í hvørji mál eru til viðgerðar t.d. í landsfyrisitingini.

Eftir grein 4, stk. 3 skal tann, ið biður um innlit, tilskila hvørji mál og hvørji skjøl hann ynskir at gera seg kunnugan við. Vit skilja hesa reglu soleiðis, at tann, sum biður um innlit, skal frammanundan vita, at tað finst eitt ávíst mál, og at tað finst eitt ávíst skjal. Hugsast kann, at myndugleikar fara at krevja av tí, ið biður um innlit, at viðkomandi í ávísan mun skal lýsa tað tilfar, sum biðið verður um.

Henda regla er sera avmarkandi, og eigur at verða broytt, so møguleikar eisini eru fyri at fáa innlit í, hvørji mál eru til viðgerðar, hvørjar avgerðir verða tiknar o.s.fr. Í Noregi og Svøríki t.d. hava fjølmiðlarnir atgongd til postlistarnar hjá ráðstovunum.

Eftir grein 10, stk. 1. eru gerðabøkur landsstýrisins millum tey skjøl, sum eru undantikin reglini um innlit. Eftir okkara meting, eigur at verða loyvt at fáa innlit í gerðabøkur landsstýrisins.

Eftir uppskotinum fara reglurnar um innlit ikki at fevna um fíggjarnevndina, men hóskandi hevði verið, at loyvt verður at fáa innlit í tann partin av arbeiðinum hjá fíggjarnevndini, sum viðvíkur umsiting av løgtingssamtyktum.

Eftir grein 7, stk. 2 er brævaskifti millum ymsar deildir innanfyri sama myndugleika at rokna sum innanhýsis arbeiðsskjøl. Tað hevur týdning, hvussu henda regla verður tulkað. Verður t.d. alt sjúkrahúsverkið roknað sum ein myndugleiki?

Í grein 16, stk. 2 eru reglur um, hvussu skjótt ein áheitan um skjalainnlit skal avgreiðast. Innan fjølmiðlarnar verður at kalla altíð arbeitt í skundi, og tí eigur henda greinin at verða neyvari orðað, so lógin ásetir, at umbøn um skjalainnlit skal gangast á møti skjótast gjørligt og uttan óneyðugt drál.

Í grein 15, stk. 2 eru reglur um kærumøguleikar. Eftir okkara meting er neyðugt við munandi neyvari reglum um kærumøguleikarnar. Tað eigur altíð at verða møguligt at kæra, um ein myndugleiki sýtir innlit, og tað eigur altíð at verða heilt greitt hvør kærumyndugleikin er.

Reglurnar um kærumøguleikar eru avgerandi fyri, hvussu stórt virði lógin fær, og okkara uppskot er, at settur verður ein kærumyndugleiki, sum er óheftur av øllum fyrisitingarmyndugleikum.

Sum heild meta vit, at tað er eitt stórt framstig, at vit fáa eina lóg um innlit, og vit mæla til, at lógin verður so fullfíggjað sum gjørligt frá byrjan, tí royndirnar í Danmark vísa, at tað tekur drúgva tíð at fáa endurskoðað eina lóg, sum bert er ætlað sum ein fyribilsloysn.

*Vinarliga*
*Útvarp Føroya*

*Viðv. Uppskotinum um innlit í almenna fyrisiting. (J. nr. 666-1/91).*

Felagið hevur ongar viðmerkingar til uppskotið.

*Fyri felagið*
*Jens M. Dalsgaard, skr.*

*Viðv. uppskotinum um innlit í almenna fyrisiting.*

Vísandi til skriv F.L. j. nr. 666-1/91, dagfest 28. mei 1991, har uppskot til løgtingslóg um innlit í almenna fyrisiting og uppskot til løgtingslóg um fyrisiting er sent sjúkrahúsverkinum til umnælis, skal verða sagt frá, at sjúkrahúsverkið sær onki til hindurs fyri at seta nevndu lógir í gildi.

Sjúkrahúsverkið hevði sæð tað sum eitt framstig, um nevndu lógir vórðu settar í gildi. Tað kann nevnast, at innan sjúkrahúsverkið verða stórir partar av nevndu lógum longu praktiseraðir. T.d. hevur sjúkrahúsverkið avgjørt at geva øllum sjúklingum innlit í egnar sjúkrajournalir, hóast hetta ikki er álagt sjúkrahúsverkinum.

Vísandi til omanfyri standandi skal sjúkrahúsverkið tí mæla til, at nevndu lógir verða settar í gildi í Føroyum.

*Høgni Joensen*

# Álit

## í

*Løgtingsmáli nr. 184/1992: Lóg um innlit í fyrisitingina (93/91).*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 20. februar 1992 og eftir 1. viðgerð 26. februar 1992 beint í rættarnevndina.

Felagsálit fyri løgtingsmálini nr. 92/91: Fyrisitingarlóg, nr. 93/91: Lóg um innlit í fyrisitingina og nr. 142/91: Løgtingsins umboðsmaður, varð lagt fram tann 1. juni 1992 og varð samtykt, at rættarnevndin skuldi arbeiða víðari við málunum 92, 93 og 142/1991 sum millumtinganevnd og leggja álit fyri løgtingið í ólavsøkutingsetuni.

Nevndin hevur havt fund við avvarðandi embætisfólk í landsstýrinum, skrivstovustjóran og økisfulltrúan til tess at kunna nevndina um gongdina í málunum, at lýsa uppskotini gjølliga og at svara spurningunum.

Nevndin umrøddi tey ummælisskriv, ið viðløgd eru lógaruppskotunum, har Føroya Blaðmannafelag, Sjónvarp Føroya, Útvarp Føroya, Kommunufelagið og Sjúkrahúsverkið gera viðmerkingar.

Av viðmerkingum landsstýrisins framgongur, at uppskotini nr. 92 og 93/1991 eru samantengd soleiðis, at tað ber ikki til at samtykkja annað, men ikki hitt. Í hesum sambandi verður sagt, at landsstýrið væntar, at lógin skuldi kunnað verið sett í gildi 1. januar 1993. Umsitingin hevur gjørt vart við, at frá tí av, at lógin er samtykt, og til hon fær gildi, skal verða rímilig tíð til at smíða reglugerðir og ásetingar. Tað er sera umráðandi, at vegleiðingar verða gjørdar til stovnar og kommunur um, hvussu mannagongdin skal vera, um lógin verður sett í gildi, soleiðis at málsviðgerðin verður eins, og at strembað verður ímóti, at praksis verður tann sami allastaðni í øllum generellum lógarnýtsluspurningum.

Nevndin heldur, at tað ber til at fáa lógina at virka frá 1. januar 1994. Nevndin setir tí fram broytingaruppskot hesum viðvíkjandi. Eisini verður ein onnur broyting sett fram, sum bert er av málsligum týdningi.

Sostatt setir nevndin fram soljóðandi:

## Broytingaruppskot

## til

## uppskot landsstýrisins

| | |
|---|---|
| 1) Eingin broyting. | 1) I § 12, pkt. 2 indsættes efter ordene "det er af væsentlig": "økonomisk". |

2) Í § 17, 1. og 2. stk. verður "1. januar 1993" broytt til: "1. januar 1994".

2) I § 17. stk. 1 og 2 ændres "1. januar 1993" til: "1. januar 1994".

Nevndin tekur undir við uppskoti landsstýrisins og er samd um, at lógaruppskotini nr. 183 og 184 verða samtykt, verða hesar lógir eitt gott grundarlag undir ætlaða arbeiðinum.

Nevndin ásannar, at verandi lóggáva og siðvenja í Danmark kann stuðla útinningini av lógini í Føroyum, tí slík lóg hevur virkað leingi í Danmark, og eru tí løgfrøðiligar niðurstøður og fordømi at vísa til. Lógirnar skuldu tí kunnað virka við rímiligum tryggleika frá byrjan.

Tað hevur leingi verið ynski um lóggávu í Føroyum, ið betur verjir hin einstaka, sum hevur samskifti við almennar myndugleikar og tryggjar honum innlit í, hvussu egnu viðurskifti hansara eru viðgjørd í umsitingini, og hvørjar metingar ella løgfrøðiligar tulkingar og avgerðir hvíla á.

Leingi varð mett, at unga umsitingin í Føroyum var ov lítið útbygd og hevði ov lítla orku til at tryggja eina so fevnandi upplýsingarskyldu sum fyriliggjandi lógaruppskot tilætlar, men metir landsstýrið nú, at tíðin er komin at festa í lóg tann rætt, viðskiftafólk kortini hava átt til at fáa innlit í viðgerð av egnum máluni.

Allastaðni, har slík lóggáva er komin, hevur ætlanin fyrst og fremst verið at tryggja einstaklingum sokallað málsinnlit í mál, ið viðkoma honum sjálvum, og er tí oftast lóggivið um júst hetta fyrst, og minni dentur lagdur á at veita almenninginum innlit í viðurskiftini hjá øðrum (hitt sokallaða almenna innlitið). Seinni eru slíkar lógir broyttar til eins væl at galda almenningin, so hesin er kunnaður um málsviðgerðir yvirhøvur.

Havandi hetta í huga hevur nevndin umrøtt ynski frá frammanfyri nevndu fjølmiðlaumboðum um, at postlistar og aðrar innanhýsis skráseitingar av arbeiðsgongd skulu almannakunngerast.

Hetta er galdandi í Noregi og Svøríki, men ikki í Danmark.

Nevndin tekur undir við landsstýrinum, at hetta stigið ikki verður tikið nú, tí tað er umráðandi, at hin einstaki, sum kennir tørv á kunning frá myndugleikunum ella hevur umsóknir og áheitanir um viðgerð av persónligum málum ikki heldur seg aftur av ótta fyri, at júst hansara viðurskifti skulu kunna koma til hvørt geilarhorn.

Nevndin heldur tí, at lógin eigur at standa sína roynd í eini tíð við álitiskendum samskifti í millum borgaran og myndugleika, áðrenn støða verður tikin til møguligar broytingar at fremja. Tað verða helst eisini aðrar broytingar at taka støðu til, tá lógin hevur staðið sína roynd.

Hvat almannakunngerð av landsstýris- og fíggjarnevndargerðabókum viðvíkur heldur nevndin, at galdandi regla, har gerðabók landsstýrisins verður framløgd

hvørja ólavsøku og fjølmiðlar so hvørt kunna seg um týðandi avgerðir, ið landsstýrið og fíggjarnevndin taka, er nøktandi.

Viðvíkjandi gerðabókini hjá fíggjarnevndini er at siga, at her er talan um samskifti millum tvær sjálvstøðugar eindir, nevniliga umsitingina og lóggávuvaldið, og er hetta tískil eitt samskifti, har borgarin ikki er uppií.

Sum nevnt er lógin galdandi fyri øll, ið ynskja at kunna seg við ávís skjøl í nærri tilskilað mál. Eftir § 16, stk. 3, ásetir landsstýrið reglur um gjald fyri avrit ella makaskjøl. Nevndin heldur, at arbeiðið hjá umsitingini eftir hesi lóg ber í sær øktan kostnað, serliga í byrjanini. Tí eigur helst eitt grundgjald at verða latið fyri ómakin, tá eitt fólk frá umsitingini má verða til taks at finna fram til og hava eftirlit við skjølunum í málinum, og kann hetta verða tíðarkrevjandi. Eitt slíkt grundgjald má ásetast av landsstýrinum eftir bestu meting.

Umsitingin hevur á fundi við rættarnevndina mett, at nýnormering av fólki ikki verður neyðug, og at eftirspurningurin eftir upplýsingum fer at javna seg sum frálíður.

Mál og skjøl, ið stava frá tíðini, áðrenn lógin fær gildi, kunnu verða latin eftir avgerð frá avvarðandi myndugleika.

Við hesum viðmerkingum mælir nevndin til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

## Broytingaruppskot

## til

*3. viðgerð av tingmáli nr. 184/1992: Lóg um innlit í fyrisitingina (93/91).*

Tað hevur stóran týdning, at Føroya fólk við hesi lóg nú fær betri møguleikar at kunna seg og døma um fyrisitingarligar og politiskar avgerðir.

Men í sambandi við lóg um alment innlit eiga eisini reglur um fjølmiðlasið (pressuetikk) at verða fyrireikaðar og settar í gildi. Tí við øktum innliti fylgir økt, ábyrgd og fólk hava krav uppá at verða vernd.

Til tess at tryggja hesum, verður sett fram soljóðandi:

## Uppskot

## til

## samtyktar

Landsstýrinum verður álagt at fyrireika og seta í gildi hóskandi reglur um fjølmiðlasið (pressuetikk).

# 185. Tiltøk at hjálpa teimum, ið sita við ovurhøgum sethúsa- og íbúðarlánum

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum, við atliti til "uppskoti til tiltøk fyri at broyta búskapargongdina í Føroyum", at gera tiltøk at hjálpa teimum, ið sita við ovurhøgum sethúsa- og íbúðarlánum.

**Viðmerkingar:**

Sambært yvirliti yvir uttanlandsskuldina hjá føroyska samfelagnum, gjørt av umboðum fyri IMF, nú teir vóru í Føroyum, øktist skuldin í valskeiðnum 1984-1988 soleiðis:

Við ársenda 1984 var almenna og privata skuldin kr. 3.060. mió.
- 1985 kr. 3.806 mió.
- 1986 kr. 5.086 mió.
- 1987 kr. 5.964 mió.
- 1988 kr. 7.755 mió.

Samlaða uttanlandsskuldin øktist sostatt úr kr. 3.060 mió. til kr. 7.755 mió. ella við tilsamans kr. 4,7 mia. hesi fýra árini.

Aftrat hesi upphæddini eiga vit at leggja útflutningsprísin upp á uml. kr. 700 mió. fyri tann stásiliga farmaskipaflota, ið føroyingar høvdu útvegað sær í valskeiðnum frammanundan, og sum varð tvingsilsseldur av landinum árini 1984 til 1988. Skuldarøkingin kann tí av røttum sigast at verða samanlagt 5,4 mia. kr. í valskeiðnum.

Landsstýrissamgongan, ið tá sat, og sum kunnugt var samansett av Javnaðar-Tjóðveldis- og Sjálvstýrisflokkinum umframt Tordi J. Niclasen og Niels Paula Danielsen, oyðslaði sostatt burtur hesi fýra árini kr. 1,35 mia. árliga í meðal umframt upphæddina, ið fekst fyri útflutningin og í ríkisstudningi.
Eftir at Fólkaflokkurin aftur kom við í landsins leiðslu, steðgaði skuldarvøksturin, sum kunnugt, og verður samlaða skuldin við ársenda 1993 væntandi minkað í

kr. 7.400 mió., um nýggja samgongan heldur fast við fólkafloksins skynsama fíggjarpolitik.

Fyri kortum almannakunngjørdi stjórin fyri Menningarstovuni vegna ein bólk av persónum við áhuga fyri samfelagsviðurskiftum eitt avbera gott íkast til kjakið um hesi viðurskiftini, við einum uppskoti til tiltøk fyri at broyta búskapargongdina í Føroyum.

Stutt kann sigast um uppskotið, at tað miðar móti radikalari lækking í kostnaðarstøðinum, við eini skattlækking uppá 50%, eini lækking av meirvirðisgjaldinum uppá 15% og eini heildarlønarlækking uppá 40%.

Í fylgiskrivi, tá uppskotið varð sent løgtinginum, verður m.a. sagt, at uppskotið er tingsins at nýta fult eftir sínum tykki.

Uppskotið samsvarar ógvliga væl teimum tiltøkum, Fólkaflokkurin heldur verða neyðug at seta í verk frameftir.

Í tvinnum pørtum viðger bólkurin støðuna hjá teimum einstaklingum og hjúnum, sum útvegaðu sær sethús ella íbúð í umtalaða tíðarskeiðnum.

Hesir partarnir eru soljóðandi:

**"Húsalán hjá ungum fólki.**
Ein bólkur í samfelagnum eru tey, sum hava útvegað sær hús í seinastuni fyri upphæddir, sum eru sera torførar at rinda aftur undir núverandi umstøðum. Tey samlaðu útlánini til húsarhald eru um 5-6 mia. kr. og av hesum er stórur partur lán, sum upptikin eru seinastu 10-12 árini. Hesi hús eigur okkara ungdómur fyri stóran part, og eingin hevur gott av, at tey missa mótið, tí tey ikki klára sínar skyldur, og kanska royna at flyta burtur í onnur lond. Hesin trupulleikin eigur at takast í største álvara.

**Grunn til fígging av húsalánum.**
Sum nevnt eru tey við stórum húsaiánum í so stórum trupulleikum, at tey valla eru før fyri at loysa teir einsamøll.

Sambært uppskotinum omanfyri fær tað almenna eina óskerda lønarlækking uppá 40%, meðan privati sektorurin fær 30% lønarlækking, og 10% av lønarupphæddini fara í ein grunn, sum skal nýtast til at lætta um fíggingina av húsum. Samsvarandi hesum 10% koma kr. 250 mió. árliga í grunnin. Gjaldið úr grunninum ella hjálpin, skal nýtast mest til teir prioritetir, sum liggja aftaná 1. prioritet. Ein nevnd til at stjórna grunninum ger reglugerð fyri hann."

Áðrenn landsstýrissamstarvið millum Fólkaflokkurin og Javnaðarflokkin slitnaði, var frá Fólkafloksins síðu dúgliga roynt at fáa nevnda uppskotið til nágreiniliga viðgerð í samgonguni við tí fyri eyga at finna heildar- eila partsloysnir úr tí.

Ein slík partsloysn skuldi verið at veitt teimum hjálp, ið sita við ovurstórum sethúsalánum. Hjálpin kundi tá annaðhvørt verið partur av heildarloysnini, soleiðis sum skotið verður upp av arbeiðsbólkinum, ella onnur loysn gjørd við atliti at uppskotinum, men kortini tillagað tí fíggjar- og búskaparpolitikki, sum samgongan annars samdist um.

Hóast Javnaðarflokkurin ógvuliga treyðugt vildi undir viðgerðina, varð avtalað uppundir samguslitið, at viðgerðin skuldi byrja.

Um nú nýggja samgongan millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldisflokkin og Sjálvstýrisflokkin ikki vil virka fyri betraðum kappingarføri m.a. við lækkaðum kostnaðar- og lønarstøði, so eigur hon, í hvussu er, at finna útvegir at hjálpa seghúsaeigarum.

Bankarnir eru saneraðir og hava fingið nýggjan kapital. Fiskiskipini verða saneraði oftast ígjøgnum tvingsilssølur. Fiskavirkini eins og onnur virki verða helst saneraði so ella so. Ígjøgnum bankarnar eru flestu rokningarnar endaðar í landskassanum.

Nú eiga hvørki landsstýrið ella løgtingið at gloyma tey húski og teir einstaklingar, ið vórðu gíslatikin í ávirkanini av hesum ólukkuliga valskeiðnum 1984-1988 og sum, um tey ikki fáa hjálp, koma at verða skuldarbundin alla livitíð sína.

Er viljin tøkur, ber til at sanera stóru sethúsalánini eisini. Landsstýrið eigur sum skjótast at taka upp samráðingar við fíggingarstovnarnar hesum viðvíkjandi. Av illum liggja ávísir møguleikar í Húsalánsgrunninum.

Fyri at vísa nýggju samgonguni á sváru trupulleikarnar hjá sethúsa- og íbúðareigarum og fyri at halda nýggja landsstýrinum til at veita ætlaðu og neyðugu hjálpina, setir Fólkaflokkurin fram uppskot til samtyktar samsvarandi:

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 185/1992: Tiltøk at hjálpa teim, ið sita við ovurhøgum sethúsa og íbúðarhúsum.*

Málið er lagt fram av Fólkaflokkinum tann 6. mai 1993 og eftir 1. viðgerð 11. mai 1993 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tríggjar minnilutar.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Hergeir Nielsen, Asbjørn Joensen) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg) vísir til viðmerkingarnar í løgtingsmáli nr. 192/1992, og mælir til at samtykkja uppskot Fólkafloksins.

Minnilutin (Tordur J. Niclasen) førir fram: Rikni politikkurin hjá undanfarnu samgongu (Javnaðarflokkinum og Fólkaflokkinum) hevur havt syrgiligar avleiðingar bæði fyri føroysku tjóðina sum heild og einstaklingar kring landið.

Arbeiðsloysið hevur støðugt verið vaksandi og kann av røttum sigast, at so at siga einki hevur verið gjørt frá politiskari síðu fyri at fáa vent gongdini.

Nú kemur so Fólkaflokkurin við uppskoti, har álagt verður landsstýrinum at gera tiltøk at hjálpa teimum, ið sita við ovurhøgum sethúsa- og íbúðarlánum.

Stórliga má tað undra at tann flokkur sum hevur havt fíggjar- og búskaparmál um hendi, at hann nú í andstøðu kemur við uppskotum um at loysa hesar trupulleikar sum hann so at siga einki gjørdi við, meðan hann hevði møguleikan til tess í landsstýrinum.

Í viðmerkingunum til uppskotið nýtir uppskotstillarin, Svend Aage Ellefsen, nógva orku til at vísa á gongdina í tíðarskeiðnum frá 1984-1988, har hann sigur at táverandi samgonga oyðslaði ikki so fáar milliardir burtur.

Einki at ivast í, at nistøk vóru gjørd í hesum tíðarskeiði, avgerðir, sum betur vóru ótiknar.

Tá ið uppskotstillarin nýtir nógva orku til at draga fram milliarda upphæddir, sum hann sigur hava verið oyðslaðar og í tí sambandi navngevur persónar, so kann ein av røttum spyrja, hvat ið sami persónur við sínum "projektum" undanfarin ár í veruleikanum hevur kostað landskassanum.

Líka mikið, um hetta uppskot Fólkafloksins má sigast at verða tað reina spæl fyri gallarínum, tá hugsað verður um, at hesin flokkur júst hevur sitið í samgongu, so eigur tað at gerast sum gerast kann, til tess at hjálpa um tey mongu, sum í dag stríðast við at fáa endarnar at røkka og í hesum sambandi serliga teim mongu ungu familjunum, sum fíggjarliga hava tað sera trupult - og eru við at missa húsini. Havandi hetta í huga verður tikið undir við uppskoti Fólkafloksins.

**Minnilutin Finnbogi Arge hevur hesar viðmerkingar:**
Fólkaflokkurin hevur lagt eitt uppskot fram, ið skal hjálpa teimum, ið sita við ovurstórum sethúsa- og íbúðarlánum.

Tá ið tú hevur sorterað politisku reklamuna frá um øll tey skinsomu avrik, sum fólkaflokkurin hevur gjørt og øll tey mistøk, sum hinir flokkarnir á tingi hava gjørt – kemur tú fram til, at uppskotið hjá fólkaflokkinum í roynd og veru ikki er uppskot hjá fólkaflokkinum, men ein avskrift av tí sum Menningarstjórin og aðrir løgdu fram herfyri sum eitt uppskot at loysa føroysku búskaparkreppuna við at lækka kostnaðarstøðið munandi, talan var um eina skattalækking uppá 50%, ein lækking av meirvirðisgjaldinum uppá 15% og eina heildarlønarlækking uppá 40%.

Svend Aage Ellefsen endurgevur síðani tað, sum nevndi bólkur heldur um húsalánini hjá ungum fólki, m.a. at samlaðu útlánini eru 5-6 mia. kr. at lánini eru

upptikin seinastu 10-12 árini, og at lántakararnir ikki fara at klára byrðarnar uttan hjálp. Hesari niðurstøðu kann minnilutin taka undir við.

Uppskotið hjá hesum bólki, sum Kjartan Kristiansen leggur navn til, er eftir minnilutans tykki als ikki av leið, men spurningurin er, um tað kann gjøgnumførast, tí talan er um eina fullkomna kollvelting av føroyska samfelagnum, og slík kollvelting kann fáa avleiðingar, sum vit í dag ikki kunnu yvirskoða.

Skal ein kollvelting gjøgnumførast fyri at fáa inntøku- og skattastøðið niður við tí fyri eyga at fáa fiskivinnuna kappingarføra og almennu lønarútreiðslurnar á eitt støði, sum samfelagið orkar at bera, so skal hetta fremjast nú meðan búskapurin er í sori.

Skal veljast ímillum eina kollvelting av hesum slag og so tað leiðina burturúr búskaparkreppuni, sum fólkaflokkurin og javnaðarflokkurin hava stungið út í undanfarnu samgongu, nevniliga at brandskatta alt, sum kann skattast og gera tað fullkomuliga óliviligt í samfelagnum, so vildi minnilutin heldur valt kollveltingina, sum, tá sjógvarnir høvdu lagt seg, hevði givið føroyingum ein møguleika í framtíðini. Samstundis hevði avleiðingin verðið, at vit høvdu kunnað livað við einum lutvíst stórum almennum sektori við nógvum fólki í vinnu um lønar- og skattaniðurskurðurin veruliga varð framdur í tann mun, sum talan er um.

Eitt kunnu vit gera okkum greitt beinanvegin, tað er, at trupulleikarnir hjá einstøku húsaeigarunum fyrr ella seinni enda í landskassanum. Hetta kann ikki verða øðrvísi, tí landið eigur jú teir føroysku bankarnar, og tað eru teir, sum koma at missa, tá ið sethúsaeigarin gevur skarvin yvir. Talan verður tí undir øllum umstøðum um avskriving ella sanering av sethúsaskuld, spurningurin er bert, hvussu tað skal gerast.

Aftaná 6. oktober og 1. februar hevur undanfarna landsstýrið spent tann føroyska skattaborgaran fyri bankarnar, sum ross fyri vogni. Tað er skattaborgarin, sum skal gjalda rokningina aftur, hvørja ferð lántøka verður framd, og tað er hann, sum í síðsta enda hongur uppá skuldina.

Tá ið hetta er grundstøðan, so er spurningurin um vit ikki beinanvegin eiga at tackla trupulleikarnar hjá sethúsaeigarum gjøgnum landskassan.

Tað er skilligt, at menn himprast við at fremja slíka kollveltandi loysn, sum bólkurin hjá Kjartan Kristiansen hevur spælt út við. Men tað ber til í fyrstu syftu at velja eina millumloysn. Henda millumloysnin gongur, sum allar aðrar loysnir, út yvir landskassans skattainntøkur, og tí má fígging fáast til vegar. Sambandsflokkurin heldur, at tað letur seg gera at fremja sparingar á fíggjarlógini bæði fyri 100 og 200 mió. kr. t.d. við at minka um almennu íløgurnar, og við hesum í huganum leggja vit fram 2 uppskot um, hvussu vit kunnu loysa trupulleikarnar hjá sethúsaeigarunum.

Seinastu árini hava tað verið fleiri flokkar, sum hava mett, at rentufrádrátturin skal minkast, og undanfarna samgongan legði eitt langtíðaruppskot fram, sum

stigvíst fram til ár 2009 avtók rentufrádráttin, samstundis sum botnfrádrátturin varð hækkaður. Uppskotið hjá okkum gongur uppá, at ístaðin fyri at lækka rentufrádráttin, so skal hann hækkast, og hann skal hækkast til 100%, og tað skal gerast beinanvegin. Hesin rentufrádráttur skal ikki galda fyri brúkslán, men skal avmarkast til ein part av sethúsaskuldini. Rentufrádrátturin skal skipast soleiðis, at rentan av sethúsaskuldini omanfyri 600.000 kann trekkjast frá. Eitt loft eigur at verða lagt á, t.d. 1,2 mió, kr. og í slíkum føri kann so sethúsaeigarin trekkja tær renturnar frá, sum verða roknaðar av skuldini omanfyri 600.000, men ikki av tí sum er omanfyri 1.200.000.

Hevur tú eina sethúaskuld uppá 1,2 mió. kr. so kvalifisera tær seinastu 600.000 seg til 100% rentufrádrátt. Í dag er rentan av hesum 600.000 umleið 72.000 árliga, og rentufrádrátturin er 28.800, sum er 40% av 72.000. Við uppskotinum hjá sambandsflokkinum hevði rentufrádrátturin verið 72.000, t.v.s. at sethúsaeigarar við hesari skuldini kundu drigið 43.200 meiri frá í skatti. Húsarhaldið hevði so havt 43.200 kr. meira um hendi árliga at goldið avdráttir við – ella ta rentuna, sum hann ikki klárar at gjalda í dag. Var so nakað avlop, so hevði tað beinanvegin ávirkað samfelagið positivt, tí forbrúkið av ymiskum slag hevði farið eitt sindur upp.

Nú kundi so onkur spurt, hví eitt loft skal setast á, sum t.d. 1.200.000. Tað hevði eisini borið til at hækka loftið til t.d. 1.500.000 kr. – og í tí førinum kundi húsacigarin trekt allar rentuútreiðslurnar frá av tí skuldini, sum var millum 600.000 og 1,5 mió., t.v.s rentuna av eini skuld uppá 900.000. Rentan av 900.000 er 108.000, og frádrátturin av 108.000 er í dag 43.200. Núverandi frádráttur uppá 43.200 hevði so ístaðin verðið 108.000 og frádrátturin hevði sostatt hækkað við 66.800. Og tað er kanska tað, sum restar í hjá fólki við hesari skuldini á hvørjum ári. Tað er betri at vit geva teimum ein møguleika at rinda skuldina enn at tey mugu fara frá húsi og heimi við teimum avleiðingum fyri børnum og familju, sum ein flyting av hesum slag nú einaferð altíð hevur við sær.

So kunnu vit spyrja hvat eitt slíkt uppskot, sum sambandsflokkurin kemur við, "kostar" landskassanum. Kostar í gásareygum, tí sum eg byrjaði við, landskassin verður taparin undir øllum umstøðum, tí tað er hann, sum eigur bankarnar, sum kunnu koma uppá tal, og tað er landskassin, sum hongur uppá ta tungu byrðu at skula fylla bankarnar við skattakrónum, um bankarnir koma í trupulleikar orsakað av sethúsaútlánunum. Og tað gera teir helst.

Taka vit fyrra uppskotið við teimum 600.000 og siga, at talan er um 2000 hús, so kostar skattafrádrátturin landskassanum í mesta lagi, men helst væl minni enn 2000 ferðir 43.200 kr. t.v.s. 86 mió, kr. Hin frádrátturin uppá 900.000 kostár so í mesta lagi 50% meira ella 129 mió. kr. um árið. Men havast skal í huga, at tað hevði bert verðið ein partur av sethúsaeigarunum, sum høvdu kvalificerað seg til fullan frádrátt.

Effektin hevði verið, at tú fekst eina felags sanering, sum bæði samstundis var individuel, og tú loysti trupulleikarnar bæði hjá sethúseigarum og bankunum. Men í hesum tonkta døminum hevur minnilutin ikki tikið hædd fyri teimum arbeiðsleysu sethúsaeigarunum, tí teir eru í einari serstøðu, sum er torførari at loysa. Men byrja vit her, og tað virkar, so ber til at fara víðari seinni.

Nú kann onkur siga, at hetta er eitt órættvíst uppskot, tað hjálpir teimum, sum hava stóra sethúsaskuld, og hini skulu gjalda, sum hava minni ella onga sethúsaskuld. Hetta er rætt, men tað ber eisini til at siga, at tey, sum hava bygt tá prísirnir hava verið hægstir, eru órættvíst behandlaði í mun til tey, sum bygdu í seksti- og sjeytiárunum, tí tað var jú fyrst og fremst inflatiónin, sum syrgdi fyri, at húsaskuldin kundi hvørva skjótt ella gerast minni tyngjandi eftir stuttari tíð.

Vit eiga eisini at hava í huga, at tey, sum bygdu miðskeiðis ella seinast í áttatiárunum, disponeraðu út frá einari kendari inntøku og einum kendum skattatrýsti. Síðani tá hevur tað almenna hækkað skattir og gjøld í slíkan mun, at forútsetningarnir fyri íløgurnar í sethús er burtur. Tað er tað almenna, sum hevur oyðilagt forútsetningarnar, og tí má tað almenan eisini vera við til at fremja loysnirnar.

Sambandsflokkurin hevur hugsað eitt sindur um, hvussu vit kunnu finna eina loysn, sum viðgerð øll eins og ikki revsar tann sparna, meðan tann, sum hevur brúkt meira, verður favoriseraður.

Hetta kann gerast við eini loysn, sum gongur uppá fermeturin. Vit hava t.d. eitt hús uppá 120 fermetrar og vit siga, at tey kosta 1.200.000. Siga vit at húsaprísurin var hægstur í 1989, so gera vit tað soleiðis, at tann, sum bygdi í 1989 fær ein skattafrádrátt uppá 360 kr. pr. fermetur, t.v.s. fyri eini hús uppá 120 fermetur verður frádrátturin 120 ganga 360, sum er 43.200. Hetta svarar til fyrra rentufrádráttardømi, sum vit høvdu uppá 600.000 kr. Hesin frádráttur skal so verða umframt núgaldandi rentufrádrátt upp á 40%. Er tað soleiðis, at kostnaðurin var hægstur í 1989, so siga vit, at frádrátturin minkar við 10% fyri hvørt árið frammanfyri 1989 og hvørt árið aftanfyri 1989. Í 1988 verður frádrátturin 90% av teimum 360 kr. pr. kvadratmetur og tað sama verður galdandi fyri 1990. Í 1987 og 1991 verður so frádrátturin 80% av 360 kr. fyri fermeturin o.s.fr.

Tað er givið, at hetta verður ein dýrari loysn fyri landskassan í fyrstu syftu, tí nú fáa øll, sum hava bygt aftaná 1980 ein fyrimun, men hetta er so eitt rættvísari system. Tað ber til at broyta tíðarskeið, so byrjað verður t.d. í 1984. Eisini ber til at geva ein minni avslátt, um menn halda, at tað verður ov dýrt fyri landskassan. Tað sama er galdandi fyri fyrra uppskotið, har kunnu bæði frádráttarprosentið og avmarkingarnar lagast til. Givið er, at fleiri kanningar mugu gerast, men hetta uppskotið er ætlað sum eitt modell ella sum ein skabelón, og ongin nýtist at læsa seg fastan í tey tølini, ið eru tikin fram í viðmerkingunum. Men tann avmarking má so vera, at avdráttur pr. fermetur ella øktur rentufrádráttur fyri part av skuldini skal bert galda fyri farna tíð og ikki í framtíðini.

Við hesum viðmerkingum setir minnilutin (Finnbogi Arge) fram soljóðandi uppskot til samtyktar, sum gevur landsstýrinum møguleika at arbeiða við og velja ímillum fermetrafrádrátt ella rentufrádrátt:

## Uppskot

## til

## samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at leggja fyri tingið lóganuppskot, sum bøtir um støðuna hjá sethúsaeigarum, sum eru fangaðir í einari skuldarfellu og sita við ovurhøgum sethúsa- og íbúðarlánum. Hetta skal gerast við einum tíðarskipaðum fermetrarfrádrátti ella við einum rentufrádrátti fyri tann partin av skuldini, sum liggur omanfyri tað støðið, sum landsstýrið metir vera gjørligt hjá sethúsaeigarum at forrenta m.a. orsakað av øktari skattabyrðu.

# 186. Broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.*

*lagtingslov om ændring i lagtingslov om arbejdsløshedsforsikring og arbejdsanvisning.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 17 frá 10. mars 1992, sum broytt við løgtingslóg nr. 69 frá 2. apríl 1993, verða gjørdar hesar broytingar:

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 17 af 10. marts 1992, som ændret ved lagtingslov nr. 69 af 2. april 1993, foretages følgende ændringer:

1) § 9 verður orðað soleiðis:

"§ 9. Landsstýrið ásetir útgjaldingarupphæddina og kann hon í mesta lagi vera 70% av teirri upphædd, sum goldin verður fyri 40 tíma arbeiðsviku íroknað frítíðarløn sambært tí til eina og hvørja tíð galdandi sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag."

1) § 9 affattes således:

"§ 9. Udbetalingsbeløbet bliver fastsat af landsstyret og kan højst udgøre 70% af det beløb, som bliver udbetalt i henhold til den til enhver tid gældende overenskomst mellem Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag for 40 timers arbejdsuge iberegnet feriepenge."

2) Sum nýggj § 12 a verður sett:

"§ 12 a. Arbeiðsleys kunnu í stuttri tíðarskeið við loyvi frá stýrinum fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina taka upp arbeiði ella útbúgvingarskeið og fáa arbeiðsloysisstuðul.

Stk. 2. Stýrið fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina ásetir nærri

2) Som ny § 12 a bliver indsat:

"§ 12 a. Arbejdsledige kan i kortere perioder med tilladelse fra bestyrelsen for arbejdsløshedsforsikringen og arbeidsanvisningen optage arbejde eller tage uddannelses kurser og få arbejdsløshedsstøtte.

Stk. 2. Bestyrelsen for arbejdsløshedsforsikringen og arbejdsanvisnin-

reglur um longdina á tíðarskeiðum, slag av arbeiði ella útbúgvingarskeiðum og treytir annars."

3) Í løgtingslóg nr. 69 frá 2. apríl 1993 um broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing verður í § 2, stk. 2 "§ 1, nr. 5" broytt til:
"§ 1, nr. 8", í § 2, stk. 3 verður "§ 1, nr. 6" broytt til:
"§ 1, nr. 9" og í § 2, stk. 4 verður "§ 1, nr. 7, 1. pkt." broytt til: "§ 1, nr. I0, 1. pkt."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

gen fastsætter nærmere regler om periodens længde, arbejdets eller uddannelseskursernes art og betingelser iøvrigt."

3) I lagtingslov nr. 69 af 2. april 1993 om ændring i lagtingslov om arbejdsløshedsforsikring og arbejdsanvisning ændres i § 2, stk. 2 "§ 1, nr. 5" til:
"§ 1, nr. 8", i § 2, stk. 3 ændres "§ 1, nr. 6" til:
"§ 1, nr. 9" og i § 2, stk. 4 ændres "§ 1, nr. 7, 1. pkt." til: "§ 1, nr. 10, 1. pkt."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

**Viðmerkingar:**

Í brævi dagfest 19. februar 1992 boðar stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina frá, at stýrið á nøkrum fundum hevur viðgjørt spurningin um, Arbeiðsloysisskipanin kann vera við í tiltøkum at seta arbeiði í gongd.

Annars verður eisini sagt, at stýrið hevur tað høvuðssjónarmið, at Arbeiðsloysisskipanin eigur at vera ein trygging móti arbeiðsloysi, ið ikki blandar seg upp í viðurskifti á arbeiðsmarknaðinum. Samstundis ásannar stýrið, at landið í løtuni er í eini undantaksstøðu, har tað kann verða rætt, at Arbeiðsloysisskipanin ger ávís undantøk frá høvuðsregluni.

Víðari verður sagt, at skal skipanin vera við í tiltøkum á arbeiðsmarknaðinum, skal hetta vera undir hesum treytum:

- Veitingin til tað einstaka virkið skal vera tíðaravmarkað.
- Virkið, ið fær veitingina, skal ikki vera í kapping við verandi føroysk virki.
- Veitingin skal ikki kunna skapa møguleika fyri at fólk, ið eru í starvi, verða søgd úr starvi.
- Veitingin skal vera útflutningsfremjandi ella innflutningsavmarkandi.
- Veitingin skal vera beinleiðis tengd at teimum einstøku fólkunum, ið fáa ávíst arbeiði á viðkomandi virki.
- Bæði vinnan og Arbeiðsloysisskipanin skulu fáa fyrimun av tiltakinum.

– Stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina avger út frá omanfyri nevndu treytum. um eitt virki kann fáa veiting frá skipanini.

Í slóðini av sváru búskaparkreppu okkara hava vit fingið eitt arbeiðsloysi, sum tíverri vísir seg at vera munandi hægri enn í grannalondum okkara. Fyri tann einstaka, sum gerst arbeiðsleysur, er tað umframt eitt fíggjarligt bakkast eisini ein sosialur smeitur. Ein kensla av, at samfelagið, tú annars er partur av, ikki longur hevur tína arbeiðsorku fyri neyðini. Tí má spurningurin um arbeiðsskapandi tiltøk síggjast á tvinnanda hátt. Arbeiðsskapandi tiltøk, sum samfelagið og búskapur okkara hevur brúk fyri og arbeiðsskapandi tiltøk, sum geva tí einstaka kensluna av at vera aktivur partur í samfelagnum. Bæði eru av alstórum týdningi.

Grannalond okkara hava drúgvar royndir við at brúka arbeiðsloysisstuðul í arbeiðsskapandi tiltøkum. Hesar royndir eiga vit at gera brúk av, tí ymiskt hevur verið, hvussu væl tey eru eydnast.

Hinvegin, so eru tað mong í Føroyum, sum hava áhugaverd hugskot um arbeiðsskapandi tiltøk, sum júst eru egnað her hjá okkum.

Líknandi heimild finst eisini í forsorgarlógini. Tí gevur tað okkum møguleika at aktivara hesar mongu miljónir, ið verða goldnar sum passivar veitingar.

Vandamálið við hesum liggur í, at slík tiltøk, sum henda heimild gevur møguleikar fyri, kunnu koma í eina óhepna kapping við arbeiðsmarknaðin, vit hava í dag. Tí er tað av týdningi, at tað er stýrið, t.v.s. partarnir á arbeiðsmarknaðinum, sum áseta tær nærri reglurnar fyri tiltøkum.

Eisini verður givin heimild til, at stýrið kann geva loyvi til, at ein arbeiðsleysur kann fara á eitt tíðaravmarkað skeið, har eingin útbúgvingarstuðul verður latin, men tó frammhaldandi kann fáa arbeiðsloysisstuðul. Treytin er tó, at viðkomandi framvegis er tøkur á arbeiðsmarknaðinum og skal taka av einum arbeiðstilboði, um slíkt verður givið.

Ásannast má, at samfelag okkara hevur brúk fyri øllum hugskotum, sum kunnu virka fyri at fáa fleiri fólk í vinnu.

Við hesum fyri eygað verður uppskotið lagt fram, sum gevur Arbeiðsloysisskipanini og stýrinum heimild til at taka aktivan leiklut í arbeiðsskapandi tiltøkum.

**Viðmerkingar til tær einstøku broytingarnar:**

**ad 1.** Broytingin í § 9 er gjørd í sambandi við ásetingina um útgjald sambært § 11, stk. 1, har landsstýrið eftir ummæli frá stýrinum fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina ásetir útgjaldingarupphæddina.

**ad 2:** Talan er um eina nýggja áseting um aktivering av arbeiðstøkum, sum í styttri tíðarskeið við loyvi frá stýrinum kunnu taka upp arbeiði og fáa arbeiðs-

loysisstuðul fyri hetta. Skotið verður upp, at stýrið ásetir nærri reglur um longdina á tíðarskeiðinum, slag av arbeiði og treytir annars. Viðvíkjandi útbúgvingarskeiðum skal talan vera um stutt skeið, har útbúgvingarstuðul annars ikki kann verða latin, og skal tann arbeiðsleysi gevast við skeiðnum, um hann fær tilboð um arbeiði.

## Álit

### í

*løgtingsmáli nr. 186/1992: Broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 6. mai 1993 og eftir 1. viðgerð tann 10. mai 1993 beint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Asbjørn Joensen, Jacob Lindenskov og Heini O. Heinesen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Óli Breckmann) tekur støðu í tingsalinum.

# 187. Uppskot um hóskandi sjúkraflutningstænastu til Vágar, Sandoyar, Hest og Nólsoyar

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at endurskipa og varðveita sjúkraflutningstænastuna til Nólsoyar, Sandoyar, Hest og Vágar á hóskandi støði.

**Viðmerkingar:**

Landsstýrið hevur nú avrátt, at í framtíðini skal bert Tróndur verða neyðsendiskip í sjúkraørindum bæði til Vágar, Sandoyar, Hest og Nólsoyar. Frammanundan hava tey trý skipini Sam, Tróndur og Ritan røkt hesa tænastuna. Hóast tað er til stóran ampa fyri ferðasambandið til Sandoyar, skal skipið av hesi orsøk, verða bundið til Gomlu Rætt um náttina.

Haraftrat er maðurin, ið hevur tikið sær av sjúkrabilinum á Sandoynni, sagdur úr starvi.

Árliga sparingin verður søgd at blíva 150 - 200 tús. kr.

Men fyri tað fyrsta er at siga, at Tróndur als ikki er hóskandi skip at sigla við um Vágafjørð! At fara í bráskundi um Vágafjørð við Trónda í sjaskveðri - fyri ikki at siga illveðri - av útsyningi, er óðamannaverk! Tað vita øll skilafólk!

Fyri tað næsta má tað sigast at verða álvarsligt afturstig trygdini viðvíkjandi, at einans skip nú skal røkja sjúkraflutning til yvir 5000 fólk á fýra oyggjum, har trý skip hava verið tøk frammanudan! Hvussu ofta verður skipið ikki á veg í Vágar, tá tað verður boðsent til Nólsoyar ella Sandoyar?

Fyri tað triðja má tað sigast ovboðið fyri hesi 5000 fólkini, at tey, alt meðan samgongupolitikkarar veita meirjáttanir ella góðtaka meirmýtslu til sjúkrahúsrakstur í Norðoyggjum og Suðri, har manntalið er at kalla tað sama, og har árligu játtanirnar frammanundan eru uppá ávikavist kr. 40 mió og kr. 25 mió., at teirnum verður frátikin tann lítli tryggleikin, tað er at vita, at skuldi okkurt borist á, so liggur skip tøkt og er ikki burtur í øðrum ørindum! Hetta fyri at spara einans 150 tús. kr.!

Fyri tað fjórða má tað sigast løgið, at tað skal vera so alneyðugt at spara hesar 150 tús kr. til 5000 fólk í Vágum, Sandoy, Hesti og Nólsoy, samsundis sum millum 110 og 130 mió. kr. verða brúktar til nýtt sjúkrahús til onnur 5000 fólk í Suðri!

Samsvarandi hesum, og eisini vísandi til, at gamli sjúkrabilurin hjá Vága Bjargingarfelag, ið verður brúktur til sjúkraflutning har vesturi, tørvar at verða útskiftur, mæla undirritaðu løgtingsmenn tinginum til at áleggja landsstýrinum alt í einum, at endurskipa, bøta uppá og varðveita eina hóskandi sjúkraflutningsskipan fyri Nólsoy, Sandoy, Hest og Vágar.

## Álit

### í

*løgtingsmáli nr. 187/1992: Uppskot um hóskandi sjúkraflutningstænastu til Vágar, Sandoyar, Hest og Nólsoyar.*

Málið er lagt fram av løgtingsmonnunum Svend Aage Ellefsen og John Petersen tann 6. mai 1993 og eftir 1. viðgerð 11. mai beint í samferðslunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við stjóran á strandferðsluni, Thomas Magnussen, sum upplýsti, at strandferðslan skal taka sær av sjúkraflutningi eftir avtalu við Landssjúkrahúsið. Henda skipan hevur verið síðani læknabáturin "Reyði Krossur" varð lagdur. Í 1992 vórðu 6 tilkallitúrar sigldir til Nólsoyar, 24 til Sandoyar og 40 í Vágar. Fyri tilkallivakt vanligar dagar fær manningin samsýning kr. 15,30 um tíman frá kl. 17 til kl. 08 og fyri vikuskifti, frí- og halgidagar er samsýningin kr. 30,60 um tíman.

Nevndin er samd um, at sjúkraflutningurin framhaldandi eigur at verða á sama støði, sum hevur verið galdandi higartil, og tekur nevndin tí undir við uppskotinum og mælir tinginum til at samtykkja tað.

# 188. Broyting í løgtingslóg um ferðagjald

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjøld av ferðaseðlum.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 37 frá 26. mai 1988 um ferðagjald við seinni broytingum verður gjørd hesa broyting:

Í § 1, stk. 1 verður "200 kr." broytt til: "300 kr."

**§ 2.**

Hesa lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur gildi fyri ferðafólkaflutning úr Føroyum, tá flutningurin verður goldin, eftir at lógin hevur fingið gildi.

*lagtigslov om ændring i lagtingslov om rejseafgift.*

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 37 af 26. maj 1988 om rejseafgift med senere ændringer foretages følgende ændring:

I § 1, stk. 1 ændres "200 kr." til: "300 kr."

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen, og har virkning for passagertransport fra Færøerne, når transporten betales efter lovens ikrafttrædelse.

**Viðmerkingar:**

Fyriliggjandi uppskot landsstýrisins um broyting í løgtingslóg nr. 37 frá 26. mai 1988 um ferðaavgjald er ein liður í royndum landsstýrisins at fylgja upp ta avtalu, ið landsstýrið gjørdi við donsku stjórnina 6. apríl í ár, har m.a. varð avtalað, at landsstýrið á fíggjarlógini fyri í ár skuldi spara ella útvega 65 mió kr.

Í hesum lógaruppskoti er skotið upp at hækka ferðaavgjaldið úr 200 kr. í 300 kr.

Ferðaavgjaldið gav í 1992 landskassanum umleið 10 mió kr. í inntøku, og á fíggjarlógini í ár er roknað við umleið somu upphædd. Við at hækka ferðaavgjaldið við 50% (100 kr.) skuldi hækkingin, mett út frá nevndu tølum, árliga givið umleið 5 mió. kr. í meirinntøku til landskassan. Men av tí at hækkingin bert fer at hava gildi fyri umleið helvtina av árinum, og at talið av ferðandi hevur verið nakað minkandi, kann tað vera, at inntøkan í ár verður nakað minni.

Landsstýrið skjýtur upp, at hækkingin fær gildi fyri allar ferðaseðlar, ið verða keyptir eftir at lógin fær gildi.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 188/1992: Broyting í løgtingslóg um ferðaavgjald.*

Málið er lagt fram 6. mai 1993 og eftir 1. viðgerð 10. mai 1993 beint í figgjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið. Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Hergeir Nielsen og Asbjørn Joensen) vísir til avtalu millum samgonguflokkarnar í hesum máli og mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Meirilutin er tó nakað ivasamur viðvíkjandi ígildissetingini. Í uppskotinum frá landsstýrinum verður mælt til, at lógin fær gildi fyri ferðafólkaflutning úr Føroyum, tá flutningurin verður goldin, eftir at lógin hevur fingið gildi.

Meirilutin heldur tað verða rættari, at lógin fær gildi fyri ferðaseðlar, ið verða bílagdir, eftir at lógin hevur fingið gildi, og setir tí fram soljóðandi:

## Broytingaruppskot

## til

## uppskot landsstýrisins

Í løgtingslóg nr. 37 frá 26. mai 1988 um ferðagjald við seinni broytingum verður § 2 orðað soleiðis:

"Henda lóg fær gildi dagin eftir at hon er kunngjørd og hevur gildi fyri ferðaseðlar, ið verða bílagdir, eftir at lógin er sett í gildi."

I lagtingslov nr. 37 af 26. mai 1988 om rejseafgift med senere ændringer formuleres § 2 således:

"Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen og har virkning for billetter der reserveres efter, at loven er sat i kraft."

Minnilutin (Anfinn Kallsberg og Finnbogi Arge) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins og mælir til, at ferðagjaldið verður óbroytt.

Minnilutin (Tordur J. Niclasen) kann ikki taka undir við uppskotinum og førir fram fylgjandi: Nýggja samgongan millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldisflokkin og Sjálvstýrisflokkin heldur fram á somu leið sum undanfarna samgonga millum

Javnaðarflokkin og Fólkaflokkin og leggur tyngjandi byrðar á fólkið, ið her búleikast.

MVG er hækkað, rentuskatturin er hækkaður og nú eisini ferðagjaldið og helst fara onnur gjøld at koma, sum tyngja um hjá borgarunum.

Henda eyðræningin av føroyska skattgjaldararnum eigur nú at fáa ein enda, ikki minst tá hugsað verður um, at politiski myndugleikin fyri ikki so langari tíð síðan skuldarbant føroyska skattgjaldaran við heilum 850 mió. kr. í tí, sum varð kallað "at bjarga føroyska peningaheiminum".

Skattgjaldarin er tikin við nøsini, uttan at politiski myndugleikin á nakran hátt tryggjaði sær, hvussu henda knappa milliard fór at verða nýtt og hvørjum hon í veruleikanum fór at koma tilgóðar.

Landsstýrið (Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin) postuleraði, tá teir eftir avtaluna frá 6. oktober 1992 endurtóku, at neyðugt var við hesi peningaligu innspræning til Sjóvinnubankan, til tess at bjarga "føroyska peningaheiminum og samfelagnum sum heild", sum tikið varð til.

Samstundis fekk føroyski skattgjaldarin aftur og aftur at vita, bæði frá landsstýrinum og bankafólki, "at nú var føroyski peningaheimurin" sterkari og tryggari enn nakrantíð!

Eisini hetta var eitt postulat! Søgan endurtók seg jú aftur í februar 1993!

Í hesum máli er føroyski skattgjaldarin hildin fyri spott, og er tað nógv sum bendir á, at í veruleikanum var tað ein stórur brølari, sum gjørdur var bæði 6. oktober 1992 og í februar mánaða 1993.

Men gjørd gerð fær kanska onga vend!

Eftir stendur skattgjaldarin - harin, sum politiski myndugleikin skuldarbant við 850 mió. kr. - spyrjandi:

"Hvat hevði veruliga hent, um peningurin ikki var latin Sjóvinnubankanum?"

"Hvar er peningurin farin?"

"Hvør er veruliga hjálptur?"

Tá eingin hevur svarað hesum spurningum og eingin tykist at gera tað, er tað bæði rætt og rímiligt, at tann skuldarbundni skattgjaldarin fær tað at vita. Eisini átti tað at verið áhugi hjá politiska myndugleikanum at fingið hesi viðurskifti uppá pláss.

Sjálvandi átti landsstýrið, áðrenn støða varð tikin til játtanina til Sjóvinnubankan, havt kannað møguligar avleiðingar av ikki at játta.

Framvegis hanga í leysari luft nógvir spurningar, sum greiða eigur at fáast á.

Tí verður skotið upp soljóðandi:

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

I. Álagt verður landsstýrinum at seta í verk kanning um, hvørjar avleiðingar tað hevði havt fyri føroyska samfelagið, um peningurin til Sjóvinnubankan ikki var játtaður.
Kanningarúrslitið skal almannakunngerast og leggjast fyri løgtingið til viðgerðar.

II. Álagt verður landsstýrinum at kunna føroyska skattgjaldaran um, hvussu peningurin, ið játtaður varð Sjóvinnubankanum, er nýttur og hvørjum hann er komin til góðar.

# 189. Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.*

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan verður gjørd hendan broyting:

§ 2, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"Fyri hvørt barnið, sum ikki er 16 ár fyrst í tí álmanakkaári, sum skattur er ásettur, verða í útroknaða landsskattinum sambært § 1 í hesari lóg, hjá teimum skattskyldugu eftir § 1 nr. 1-6 í samtíðarskattalógini, í 1993 drignar frá kr. 2.300 og í 1994 og framvegis kr. 2.400 sbr. § 46, stk. 3 í somu lóg."

*lagtingslov om ændring af lagtingslov om udskrivning af skat til landskassen.*

§ 1.

I lagtingslov nr. 87 af 1. september 1983 om udskrivning af skat til landskassen foretages følgende ændring:

§ 2, stk. 1 affattes således:

"For hvert barn, som i begyndelsen af det kalenderår, for hvilket skatten udskrives, er under 16 år, gives der til de i kildeskattelovens § 1, nr. 1-6 nævnte skattepligtige personer i 1993 et fradrag på 2.300 kr. og i 1994 og fremover et fradrag på 2.400 kr. i den i hehold til § 1 i denne lov beregnede skat."

§ 2.

Hendan lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelse.

**Viðmerkingar:**

Landsstýrið skjýtur í fyriliggjandi uppskoti upp at broyta løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan solciðis, at barnafrádrátturin í landsskattinum verður hækkaður.

Skotið verður upp, at barnafrádrátturin, sum er ein frádráttur í útroknaða landsskattinum, í 1993 verður hækkaður við 100 kr. úr núgaldandi 2.200 kr. upp í 2.300 kr. Fyri 1994 og frameftir verður skotið upp, at frádrátturin verður 2.400 kr.

Roknað er við eini meirvirðisgjaldsskyldugari nýtslu upp á 8.500 kr. fyri hvørt barnið um árið. Ein meirvirðisgjaldshækking upp á 2% gevur sostatt húskinum eina meirútreiðslu uppá 170 kr. fyri hvørt barnið. Fyri eitt hálvár er meirkostnaðurin 85 kr. Fyri at uppviga henda meirkostnað, skjýtur landsstýrið upp at hækka barnafrádráttin.

Uppskotið er tengt at uppskotinum til broyting í lógini um meirvirðisgjald, løgtingsmál nr. 190/1992, har skotið verður upp at hækka meirvirðisgjaldið úr teim galdandi 23% upp í 25% fyri at skapa landskassanum eina meirinntøku í 1993 og harvið fáa ein part av teim 65 mió kr. til vega, ið Landsstýrið hevur gjørt avtalu við donsku stjórnina um at spara ella útvega í ár.

Broytingin í meirvirðisgjaldslógini fer sjálvsagt at føra til eina útreiðsluøking fyri allar brúkarar í Føroyum, men landsstýrið heldur, at hjá barnafamiljum kann hækkingin merkjast serliga tyngjandi, og bøtt verður tí nakað um hesi viðurskifti við at hækka barnafrádráttin í landsskattinum.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 189/1992: Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 6. mai 1993 og eftir 1. viðgerð tann 10. mai 1993 beint í skattanevndina.

Uppskotið er ein avleiðing av meirvirðisgjaldshækkingini frá 23% til 25% frá 1. juli 1993. Skotið verður upp at hækka barnafrádráttin við kr. 100 ella til kr. 2.400 frá árinum 1994.

Nevndin mælir til at samtykkja uppskotið.

# 190. Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 136 frá 8.september 1992 verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 10, stk. 1 verður "81,30%" broytt til: "80,0%".
2) Í § 13, stk. 5 og 6 verður "81,30%" broytt til: "80,0%"
3) Í § 14 verður "23%" broytt til: "25%".
4) Í § 17, stk. 1 verður"18,70%" broytt til: "20,0%".
5) Í § 27, stk. 2 og stk. 8 verður "23%" broytt til:"25%".
6) Í § 28 verður "23%" broytt til: "25%".

**§ 2.**

Henda lóg fær gildi 1. juli 1993.

**Stk. 2.** Lógin hevur gildi fyri meirvirðisgjaldsskyldugar latingar av vørum og tænastum, ið verða latnar frá og við 1. juli 1993.

**Stk. 3.** Fyri vørur, ið verða innfluttar, verður hækkaði avgjaldssatsurin at galda fyri vørur, ið verða latnar til tolling frá og við 1. juli 1993.

**Stk. 4.** Fer fram aftursending av vørum, ið eru latnar áðrenn 1. juli 1993,

*lagtingslov om ændring i lagtingslov om meromsætningsafgift.*

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 136 af 8. september 1992 foretages følgende ændringer:

1) I § 10, stk 1 ændres "81,30%" til: "80,0%".
2) I § 13, stk. 5 og 6 ændres "81,30%" til: "80,0%".
3) I § 14 ændres "23%" til:"25%".
4) I § 17, stk 1 ændres "18,70%" til: "20,0%".
5) I § 27, stk. 2 og stk. 8 ændres "23%" til: "25%".
6) I § 28 ændres "23%" til: "25%".

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft 1. juli 1993.

**Stk. 2.** Loven finder anvendelse på leverancer af varer, der sker fra og med den 1. juli 1993.

**Stk. 3.** Ved indførelsen af varer sker afgiftsberigtigelsen med den forhøjede afgiftssats, når varerne angives til fortoldning fra og med 1. juli 1993.

**Stk. 4.** Modtages varer retur, der er leveret før den 1. juli 1993, foretages

verður avgjaldsskyldugi umsetningurin eftir meirvirðisgjaldslógini broyttur, so at avgjald virkisins verður javnað við tí fyrr goldna avgjaldinum av tí upphædd, ið er endurrindað viðskiftafólkunum. Fyri tap upp á krøv viðvíkjandi latnum vørum og avgjaldsskyldugum tænastum verður gjørd samsvarandi javnan.

**Stk. 5.** Landsstýrið kann áseta nærri reglur til fremjing av lógini.

ændring af den afgiftspligtige omsætning efter merværdiafgiftsloven således, at virksomhedens afgiftstilsvar reguleres med den tidligere betalte afgift af det beløb, der er godtgjort kunden. På tab på uerholdelige fordringer foretages tilsvarende regulering.

**Stk. 5.** Landsstyret kan fastsætte nærmere regler til gennemførelse af loven.

**Viðmerkingar:**

Á fundi í Keypmannahavn 6. apríl 1993 millum ríkisstjórnina og landsstýrið varð avtalað, at landsstýrið skal spara ella útvega 65 mió. kr. aftrat í ár til at bøta um raksturin av landskassanum.

Landsstýrið leggur tí trý løgtingsmál fyri tingið um inntøkulógir. Tey eru løgtingsmál nr. 188/1992: Broyting í løgtingslóg um avgjald á ferðaseðlum, løgtingsmál nr. 189/1992: Broyting í løgtingsmáli um áseting av skatti til landskassan og løgtingsmáli nr. 190/1992: Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald.

Inntøkurnar í 1993 sambært hesum uppskotum eru mettar soleiðis:

**Eykainntøkur í mai 1993**

| | | |
|---|---|---|
| | 1.000 | kr. |
| Ferðaavgjald, 200 kr. hækkað til 300 kr. | 5.000 | kr. |
| Rentuskattur, 18% hækkað til 22% | 21.000 | kr. |
| Meirvirðisgjald, 23% hækkað til 25% | 20.000 | kr. |
| Eykainntøkur tilsamans | 46.000 | kr. |

Støða verður tikin seinni í ár til at spara tær írestandi 20 mió. kr., sum krevjast, um sparingar og eykainntøkur tilsamans skulu vera 65 mió. kr.

Sum tað sæst, verður roknað við, at hækkingin av meirvirðisgjaldinum sambært hesi lóg við 2% fer at geva 20 mió. kr. í ár, t.v.s. at hvørt stig í meirvirðisgjaldinum er roknað at geva 20 mió. kr. um árið.

Her skal tó viðmerkjast, at nakað vist fæst ikki at vita um, hvat meirvirðisgjaldið gevur, fyrr enn 10 mai, tá avroknað verður fyrstu ferð sambært hesi nýggju skipan.

Viðvíkjandi skiftisreglum: Í sambandi við uppskotið um at hækka avgjaldssatsin úr 23% upp í 25% eru ymsar avleiðingar, sum stinga seg upp viðvíkjandi

teimum virkjum, ið hava sent rokningar, sum eru galdandi fyri alt árið, við tí upprunaligu meirvirðisgjaldsupphæddini.

Tey virki, ið her verður hugsað um, eru SEV, Telefonverkið og oljufeløg, sum senda rokningar ávikavist fyri ársfjórðingin ella alt árið.

Landsstýrið mælir til, at skiftisreglurnar hesum viðvíkjandi verða:

Fakturering: Fakturair, rokningar og avrokningarskjøl, sum frá og við 1. juli 1993 eru útskrivaðar fyri latingar, sum eru gjørdar áðrenn meirvirðisgjaldshækkingina, og sum meirvirðisgjaldsupphæddin við 18,70% skal innihalda upplýsingar um.

Latingartíðarskeiðið: Um ein lating, sum er hend 1. juli 1993 ella seinni, og er fakturerað (við 18,70% MVG) áðrenn hesa dagfesting, skal krevjast eftirgjaldskrav.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 190/1992: Broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 6. mai 1993 og eftir 1. viðgerð tann 10. mai 1993 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jacob Lindenskov, Heini O. Heinesen og Lasse Klein) vísir á, at landsstýrið í viðmerkingunum um hækking av meirvirðisgjaldinum frá 23% til 25% sigur, at hetta er neyðug hækking til tess at røkka endamálinum at útvega landskassanum meirinntøkur til at bøta um raksturin.

Mælt verður til, at fylgjandi broytingar verða gjørdar í uppskoti landsstýrisins: Í § 1 verður gjørd ein rætting, so at § 13, stk. 3 eisini verður umfatað av broytingini. Í § 2 verður skotið upp, at stk. 3 verður orðað soleiðis, at eingin ivi skal verða um, at tað eru allar vørur, sum verða loyvdar at útflýggja frá og við 1. juli 1993, ið verða umfataðar av hækkingini. T.v.s. við vanligum innflutningi, har vørur verða tollaðar í sambandi við útflýggjan, verður tollingardagfestingin avgerandi. Fyri viðskiftafólk, ið hava tollkreditt, verður komudagfestingin avgerandi fyri avgjaldssatsin.

Meirilutin mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins við nevndu broytingum og setir samsvarandi hesum fram soljóðandi:

## Broytingaruppskot

## til

## uppskot landsstýrisins

1) § 1, pkt. 2 verður orðað soleiðis:
"Í § 13 stk. 3, 5 og 6 verður "81,30%" broytt til "80,0%".

2) § 2, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"Lógin hevur gildi fyri meirvirðisgjaldsskyldugar latingar av vørum og tænastum, ið verða latnar frá og við 1. juli 1993."

3) § 2, stk.3 verður orðað soleiðis:
"Fyri vørur, ið verða innfluttar, verður hækkaði avgjaldssatsurin at galda fyri vøur, ið av tollvaldinum verða loyvdar útflýggjaðar frá og við 1. juli 1993."

1) § 1, pkt. 2 affattes således:
"I § 13, stk. 3, 5 og 6 ændres "81,30%" til "80,0%."

2) § 2, stk. 2 affattes således:
"Loven finder anvendelse på leverancer af varer og ydelser, der sker fra og med den 1. juli 1993."

3) § 2, stk. 3 affattes således:
"Ved indførelse af varer sker afgiftsberigtigelsen med den forhøjede afgiftssats, når varerne tillades udleveret af toldvæsenet fra og med 1. juli 1993."

Minnilutin (Bjarni Djurholm) vísir á, at tað undir nevndarviðgerðini ikki var møguligt at fáa upplýst, hvussu landsstýrið ætlar at fáa liendur á teimum írestandi kr. 20 mió. fyri at náa tær kr. 65 mió., ið álagdar vórðu at spara á fíggjarløgtingslógini. Tískil er heldur ikki gjørligt at meta, um MVG-hækkingin er neyðug, skal samlaða sparingin røkkast.

Minnilutin (Finnbogi Arge) tekur ikki undir við málinum.

# 191. Broyting í løgtingslóg um bundna uppsparing

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um bundna uppsparing.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 70 frá 3. juli 1989 um bundna uppsparing við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 4, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"Uppsparingin fyri 1989 verður rentað við 5% p.a. Ein triðingur er útgoldin í 1992, ein triðingur verður útgoldin í 1995 og ein triðingur í 1996. Afturgjaldingin fer annars fram, tá tann uppsparingarskyldugi verður 65 ár, kemur í gjaldstrot ella doyr."

2) § 4, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"Uppsparingin fyri 1990 og 1991 verður útgoldin við eini helvt í juli 1993 og eini helvt í juli 1994. Afturgjaldingin fer annars fram, tá ið tann uppsparingarskyldugi verður 65 ár, kemur í gjaldstrot ella doyr."

**§ 2.**

Ilenda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

*lagtingslov om ændring i lagtingslov om bunden opsparing.*

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 70 af 3. juli 1989 om bunden opsparing med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) § 4, stk. 2 affattes således:
"Opsparingen for 1989 forrentes med 5% p.a. En trediedel er udbetalt i 1992, en trediedel udbetales i 1995 og en trediedel i 1996. Tilbagebetalingen finder ellers sted, da den opsparingspligtige bliver 65 år, går konkurs eller dør."

2) § 4, stk. 3 affattes således:
"Opsparingen for 1990 og 1992 udbetales med halvdelen i juli 1993 og den anden halvdel i juli 1994. Tilbagebetalingen finder ellers sted, da den opsparingspligtige bliver 65 år, går konkurs eller dør."

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

**Viðmerkingar:**

Upprunaliga ætlanin við bundnu uppsparingini í 1989, sum var 95,6 mió. kr., var, at hon skuldi flytast á konto hjá skattgjaldaranum 1. juli 1992, men ikki koma til útgjaldingar, fyrr enn skattaborgarin fylti 65 ár.

Men hetta varð broytt við løgtingslóg nr. 88 frá 5. juni 1992 soleiðis, at ein triðingur varð útgoldin 1. juni 1992, og síðan skuldi ein triðingur útgjaldast í 1993 og ein triðingur í 1994.

Sambært lógaruppskotinum, sum her verður lagt fram, verða teir báðir triðingarnir av 1989-uppsparingini, sum skuldu útgjaldast í ávikavist 1993 og 1994 í staðin útgoldnir í 1995 og 1996.

Harafturímóti verður tann bundna uppsparingin fyri 1990 og 1991 útgoldin við einari helvt 1. juli 1993 og einari helvt 1. juli 1994.

Bundna uppsparingin fyri 1990 var 87 mió. kr. og fyri 1991 29 mió. kr. og stendur á konto uppspararans í peningastovni.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 191/1992: Broyting í løgtingslóg um bundna uppsparing.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 6. mai 1993 og eftir 1. viðgerð 10. mai 1993 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Hergeir Nielsen, Asbjørn Joensen, Anfinn Kallsberg og Tordur J. Niclasen) vísir á, at umstøðurnar í samfelagnum eru nógv broyttar, síðani lógin um bundna uppsparing varð samtykt í 1989.

Tá var nógvur peningur millum fólk. Virksemið og nýtslan var alt ov stór. Hetta førdi til vaksandi hall á handilsjavnaðinum og vaksandi gjaldsjavnahall. Tí varð samtykt at taka nakað av peningi burtur úr umfarinum. Hetta varð gjørt við lógini um bundna uppsparing.

Í dag er støðan nógv øðrvísi. Gjaldførið í samfelagnum er vánaligt, virksemið er lítið og einki, og tað sama er at siga um nýtsluna. Tí tekur meirilutin undir við, at bundna uppsparingin í peningastovnunum, sum annars skuldi verið leysgivin 1. juli 1994, verður leysgivin fyrr enn ætlað.

Eitt annað, ið telur við í støðutakan meirilutans er, at tann triðingurin av bundnu uppsparingini, sum liggur í landskassanum, og sum skuldi gjaldast út 1. juni í ár, ikki kann verða útgoldin, orsakað av tí vánaligu gjaldførinum hjá landskassa-

num. Í uppskotinum mælir landsstýrið til, at hesin triðingurin verður útgoldin í 1995 og tann seinasti triðiingurin av tí partinum av uppsparingini, verður útgoldin í 1996.

Tann parturin av bundnu uppsparingini, sum stendur á bókleysari konto hjá tí einstaka í peningastovnunum, verður sambært uppskotinum útgoldin við einari helvt nú og einari helvt í 1994. Hesum tekur meirilutin undir við og mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins við eini lítlari broyting í § 4, stk. 3.

Í broyting nr. 2 í uppskotinum hjá landsstýrinum (§ 4, stk. 3) verður sagt, at onnur helvtin av hesi uppsparing verður útgoldin í juli 1993 og hin helvtin í juli 1994. Meirilutin mælir til, at ávísir dagar fyri, nær uppsparingin verður leysgivin, verða settir inn í lógartekstin.

Mælt verður til, at tann helvtin, sum skal gjaldast út í 1993, verður leysgivin 1. juni 1993, og helvtin, ið skal gjaldast út í 1994, verður leysgivin 1. august 1994. Út frá hesum setir meirilutin fram soljóðandi:

**Broytingaruppskot**

**til**

**uppskot landsstýrisins**

| | |
|---|---|
| § 4, stk. 3, 1. pkt. í løgtingslóg nr. 70 frá 3 juli 1989 um bundna uppsparing við seinni broytingum verður orðað soleiðis: | § 4, stk. 3, 1. pkt. i lagtingslov nr. 70 af 3. juli 1989 om bunden opsparing med senere ændringer formuleres således: |
| "Uppsparingin fyri 1990 og 1991 verður útgoldin við eini helvt tann 1. juni 1993 og eini helvt tann 1. august 1994." | "Opsparingen for 1990 og 1991 udbetales med halvdelen den 1. juni 1993 og den anden halvdel den 1. august 1994." |

Minnilutin (Finnbogi Arge) tekur støðu í tingsalinum.

# 192. Setan av nevnd til at koma við uppskotum um, hvussu búskapurin í landinum kann byggjast uppaftur

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Ásannandi ta truplu búskaparligu støðu, samfelagið er í, seta løgtingið og landsstýrið í felag ein skjóttarbeiðandi arbeiðsbólk við 4-6 limum at útgreina neyðug tiltøk til at økja um virksemið í samfelagnum og byggja uppaftur føroyska búskapin.

Útgreiningin umfatar tey í viðmerkingunum raðfestu økini 1 - 8. Álitið "Uppskot til tiltøk fyri at broyta búskapargongdina í Føroyum" verður brúkt í útgreiningararbeiðnum.

Arbeiðsbólkurin skal eisini hava samband við møguligan danskan arbeiðsbólk viðvíkjandi føroyskum viðurskiftum.

Útgreiningararbeiðið skal verða liðugt í seinasta lagi 1. juli 1993.

**Viðmerkingar:**

Niðurgangstíðirnar hava nú vart meira enn fýra ár, síðani stóra nýtslan hjá føroyingum helt uppat, og vit øll vórðu greið yvir, at nú ber ikki til at læna meira, men hugsast má um, hvussu vit afturrinda ta stóru skuld, sum alt samfelagið hevur sett seg í.

Hesi fýra árini hava lært okkum, at ikki er lætt at koma uppaftur á slætt, tá ið ferðin hevur verið so stór báðar vegir.

Í dag mugu vit ásanna, at allir partar av samfelagnum eru so illa fyri, at vit loysa ikki trupulleikarnar bert við egnari hjálp, og mugu tí leita okkum hjálp, har hon er at finna.

Vit vita, at tann, sum skal biðja um hjálp, og serliga tá ið tað er til fígging, so er ikki lætt at seta treytir, men ein noyðist at ganga undir tær treytir, sum "hjálparin" ásetir. Men tað hevur stóran týdning at upplýsa hann væl um, hvussu umstøðurnar eru, har hann skal hjálpa, so at hann ikki oyðileggur so stórar partar av økinum, sum hann hjálpir, at tað kanska ikki betrar um støðuna, men ger verri.

Kreppan í Føroyum nú kann náttúrliga býtast upp í hesar partar:

1. Flakavirkir
2. Fiskiflotin
3. Aling
4. Onnur vinna og handil
5. Landskassin
6. Kommunur
7. Peningastovnar
8. Privatfólk

1. Tað verður arbeitt við einari skipan fyri flakavirkini, sum skal gera, at tey verða rentabul at reka. Tað má gerast við at minka um skuldina hjá teimum, tí hon er ov stór, partvís av tí, at ov nógv er útbygt til ta rávøru, sum er tøk, partvís tí, at stuðul ikki verður latin longur, og partvís av, at marknaðarprísir fyri fiskavørur eru nógv falnir.

   Ein skipan fyri flakavirkini viðførir, at nakrir útlendskir fíggjarar missa nakað av peningi, føroysku peningastovnarnir missa nógv, landskassin missir munandi, og føroyskar fyritøkur og privatpersónar missa eisini rættiliga munandi av peningi.
2. Fiskiflotin er sera illa fyri, og størsti parturin av honum verður nú rikin frá degi til dags, tí eingin verulig fígging er. Teir peningastovnar, sum hava útvegað rakstrarfígging, veita so frægt av fígging, at førini hóra, inntil teir (fíggingarstovnarnir) fáa stundir til at taka sær av at kanna eftir, um møguleiki er fyri at reka skipini framhaldandi, ella tey mugu sleppast, ella at tey eisini mugu fáa eina serskipan, sum aftur viðførir stórar peningaligar avskrivingar. Har missir aftur landskassin, peningastovnar, fyritøkur og privatfólk nógvan pening. Hetta ger sjálvandi eisini, at torført verður at finna nakran, sum kann og vil seta nýggjan eginpening í, og sum kann og vil fíggja part av einum keypi og hartil rakstur.
3. Alingin er í stórum trupulleikum, og verður í løtuni roynt at sanera hana, men óivað er tað so, at fleiri alarar noyðast at gevast, tí teir ikki klára at fíggja longur. Her hava eisini allir partar mist.
4. Onnur vinna, sum t.d. fyritøkur, ið framleiða til útflutningsvinnuna, eru tódnaðar nógv, tí lítið er at framleiða til, og kundarnir hava lítla orku til at rinda fyri tað, teir skulu nýta. Hesar fyritøkur hava munandi minni fólk í arbeiði, og fleiri eru uppsteðgaðar. Handlar eru av góðum grundum eisini farnir av knóranum, og aðrir hava nógv minkaðan umsetning.
5. Landskassin hevur mist ómetaliga nógvan pening og kann missa nakað aftrat. Men trupulleikin hjá landskassanum framyvir verður ikki at missa

pening, men í staðin ikki at fáa nóg mikið til at fáa javnvág á fíggjarlógina, og sjálvt um tiltøk verða gjørd leypandi við at útvega meira pening, so níður grundarlagið fyri inntøkunum undan so hvørt. Tí verða vit ongantíð vís í, at nú er nóg mikið til, at ætlanin fer at halda. Vit mugu í staðin ásanna, at tað hjálpir ikki at leggja fleiri gjøld á vinnu og privatfólk.

6. Kommunumar eru komnar út í sama óføri sum virkir og skip við tað, at tær skylda so stórar upphæddir, at við tí minkandi virkseminum í landinum hava tær flestu ongan møguleika at svara hvørjum sítt. Tær skulu hava fund við Ráðgevandi Nevndina hjá forsætismálaráðnum, og valla hava tær nakað nøktandi svar upp á tann upplagda spurningin, hvussu tær greiða sínar skyldur.
7. Øllum føroyskum bankum tørvaðu at fáa pening tilfluttan, og kom hann fyri størsta partin frá føroysku skattgjaldarunum, tó lagt út av donsku skattgjaldarunum fyribils. Hesir fíggingarstovnar eru so illa fyri í dag, ella tora teir ikki at fíggja nakað, tí teir eru ræddir fyri at missa pening, so í veruleikanum er ikki gjørligt at fáa fígging til nakað sum helst. Føroyingar liggja heldur ikki inni við nógvum peningi í dag, ið hvussu er ikki sum teir vilja seta í nakað, og tí verður eingin menning av nøkrum vinnuligum slag, sum støðan er.
8. Vit síggja, at arbeiðsloysið er komið har upp, sum eingin av okkum tordi at hugsa, at tað fór at koma, og nú verða vit ikki bilsin, um tað fer longur. Mong, sum hava arbeiði, hava munandi minni arbeiði, og fleiri eru farin niður í løn. Umframt at arbeiðið er minkað, so hava heilt nógv - serliga ung - so stóra lánibyrðu av húsalánum, at um tey kanska kundu klárað seg annars, so hava tey als ongan møguleika at greiða hvørjum sítt við tí skuld, sum sera mong hava sett seg í, sjálvandi í trúgv til, at nóg mikið av arbeiði fór at verða.

**Vit síggja at,**

1. Nøkur flakavirkir verða endurreist, men í besta lagi helmingurin og fleiri fólk koma ikki í vinnu, helst færri.
2. Flestu fiskiførini klára ikki at verða til fiskiskap longur, og aftaná eina bygnaðarbroyting er tað bert ein partur, sum kann framyvir,
3. Alingin minkar í stórum, tí fígging ikki fæst, og harvið minkar virksemið og úflutingurin,
4. Onnur vinna og handil verður bert ein partur av, hvat tey hava verið,
5. Landskassin kemur ikki at fáa javnvág í raksturin, og tí verður ov lítið til tey alment løntu, til pensiónir og annan almennan rakstur.
6. Kommunuvirksemið fer at halda uppat, tí eingin peningur er til annað enn lán, og kanska heldur ikki til tað,

7. Peningastovnarnir eru ikki førir fyri at fíggja nýtt virksemi, og um stórur partur av tí, sum enn hórar, steðgar, sum álvarsligur vandi er fyri, so kanska teir skulu hava pening tilførdan, um hann kann útvegast,
8. Privatfólk hava mist arbeiði, fleiri koma at missa, tey klára ikki sínar láni-skyldur og vilja tí fyrst hugsa um "dagin og vegin". Tað vil ganga út yvir peningastovnarnar, og nøkur flyta burtur, og tað gongur út yvir landskassan. Tað ringasta er, at fólk missa sítt lívsgrundarlag, og hvat kann vera verri!

Frammanfyri er føroyski búskapurin býttur upp í átta, og kreppan, sum hvør av hesum pørtum er í, er nóg stór til, at fyri fáum árum síðani høvdu vit sagt, at her má nakað álvarsligt gerast fyri at bøta um avleiðingarnar. At allir átta partarnir nú eru í djúpari kreppu, má annaðhvørt føra til, at umboð fyri allar partarnar finna saman fyri at vita, hvat gerst fyri at bøta um støðuna, ella fyri at gera sær klárt, at vit eru ikki einsamallir førir fyri at loysa eitt so stórt vandamál fyri tjóðina innanlendis, og so má støða takast til, hvør kann hjálpa okkum, bæði innanríkis og uttanríkis.

Um nakar heldur, at tað, sum er nevnt omanfyri, er ov nógv gjørt av, so kann hann siga til, men valla heldur nakar tað, sum bert fylgir eitt sindur við. Um støðan er sum omanfyri greitt frá, so ber ikki til at sita og bíða eftir, at okkurt hendir, og so gera vit okkurt. Tað er ikki statsmannahegni, tað er ikki vanligur búskaparpolitikkur, og tað er heldur ikki vanligt gonguvit.

Ein arbeiðsbólkur hevur gjørt "uppskot til tiltøk fyri at broyta búskapargongdina í Føroyum". Uppskotið vísir á fyrst og fremst, at virksemið í landinum má økjast. Fyritreytin fyri hesum er, at kostnaðarstøðið lækkar, almennu útreiðslurnar lækka, skatturin og avgjøldini lækka. Harafturat mugu tiltøk fremjast fyri at bøta um húsalánsviðurskiftini hjá unga fólkinum.

Hetta hevði fingið útlendskan kapital at fíggja nýtt virksemi og harvið aftur økt um aktivitetin í samfelagnum og minka um arbeiðsloysið. Fylgjan verður so víðari, at yvirskot kann fáast á fíggjarlógina, og landskassa- og kommunuskuldin kann verða avdrigin.

Men nakað týðandi má gerast, og tað hevur skund.

Við hesi álvarsomu støðu í huga verður sett fram frammanfyristandandi uppskot til samtyktar.

# Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 192/1992: Setan av nevnd til at koma við uppskotum um, hvussu búskapurin í landinum kann byggjast uppaftur.*

Málið er lagt fram av Fólkaflokkinum tann 6. mai 1993 og eftir 1. viðgerð tann 12. mai 1993 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tríggjar minnilutar.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Hergeir Nielsen, Asbjørn Joensen) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg) førir fram: Uppskotið er hygt á uppskot frá einum arbeiðsbólki, umboðaður av Kjartan L. Kristiansen, menningarstjóra, og lagt fram fyri umboð fyri flokkarnar á løgtingi, tann 18. mars 1993.

Uppskotið tekur upp flest allar tættir í samfelagnum, og hvussu vit kunnu tillaga hetta eftir teimum broyttu búskaparligu umstøðunum, ið vit eru komnir í. Í hesum døgum verður nógv tosað um sanering av fiskavirkjum uppi á landi. Ein slík sanering er neyðug, eingin ivi um tað, men hetta er bert ein lítil partur av tí samlaðu skuldini, ið verður at sanera, so ella so.

Fyri at lýsa eitt sindur, hvat tað er vit tosa um, so kann nevnast at samlaða skuldin í flakavirkjunum er umleið 800 mió. kr., 200 mió. kr. í donskum kreditfeløgum og 600 mió. kr. í føroyskum bankum. Henda skal avskrivast við 50% til 400 mió. kr. og av hesum 400 mió. kr. skulu 2/3 niðurfrystast fyribils. Hetta inniber, at í staðin fyri at gjalda rentur og avdráttir av 800 mió. kr. skulu virkini nú gjalda rentu og avdrátt av 133 mió. kr.

Fyri skipini er støðan minst líka vánalig, tey vinna einki til rentur og avdrátt sum er, men tey verða sanerað so ella so, kanska við tí úrsliti at tey bestu av hesum skipum verða seld av landinum og vit sita eftir við gomlum vánaligum skipum, sum eingin annar skoytir um. Her eru ongar ætlanir, hvørki frá fíggingargrunni ella frá landsins myndugleikum at hava fingurin á pulsinum.

Ein annar stórur bólkur, nevnliga sethúsaeigarin skyldar millum 5 og 6 mia. kr. í lánum. Her eru heldur ongar ætlanir og einki uppskot frá fíggingargrunni ella landsstýri, hvussu vit kunnu fyribyrgja, at allir sethúsaeigarar fara á húsagang og harvið eisini Húsalánsgrunnurin, bankar og sparikassar. Fyriliggjandi uppskot hevur eitt boð uppá, hvussu hetta kann fyribyrgjast, men tað hevur helst ongan áhuga hjá sitandi samgongu. Skulu somu saneringsætlanir fremjast yvir alt samfelagið kemur hetta at kosta meira enn 10 mia. kr.

Fólkaflokkurin hevur eisini lagt eitt serskilt uppskot um at fáa hjálp upp á hetta, og vísa vit til uppskotið "tiltøk at broyta búskapargongdina í Føroyum", har víst verður á, hvussu 250 mió kr. kunnu útvegast um árið.

Hvussu peningurin mest rættvíst kann útgjaldast sethúsaeigarum kunnu verða fleiri meiningar um, og eigur at verða kannaðar gjølla, men eitt ávíst kr. tal pr. m² upp til 120 m² er møguliga ein loysn.

Hetta eru alt spurningar, sum uppskot okkara gongur út uppá, at fáa kannað sum skjótast. Eitt skulu vit gera okkum greitt, og tað er, at tvangsaktiónir, saneringar o.s.fr. gera ikki tað samlaðu fíggjarstøðuna í landinum betur, og tí verður úrslitið, at lata vit bert standa til, so endar alt á landskassanum (statskassanum) og tað kann ikki verða meiningin.

Út frá hesum mælir minnilutin (Anfinn Kallsberg) til at samtykkja uppskot Fólkafloksins.

Minnilutin (Finnbogi Arge) heldur ikki, at trupla búskaparstøðan verður loyst við at seta fleiri nevndir at arbeiða við búskaparspurningum. Tað er uppgávan hjá politisku flokkunum, hjá løgtingi og landsstýri at koma við loysnum, sum bøta um búskaparstøðuna í landinum.

Teir fólkavaldu hava Búskaparráðið, Ráðgevandi nevndina hjá forsætismálaráðnum og nýggja nevnd undir forsætismálaráðnum at stiðja seg til umframt serkøn fólk í føroysku fyrisitingini.

Nýggjar nevndir loysa ikki trupulleikarnar, men tað sum umræður, er at taka tey ráðini, nevndu ráð og serkøn koma við, í álvara.

Minnilutin (Finnbogi Arge) tekur ikki undir við uppskotinum.

Minnilutin (Tordur J. Niclasen) ásannar, at búskaparkreppan í samfelagnum tey seinastu tvey árini, Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin hava sitið í Tinganesi, er versnað munandi. Orsøkirnar hava verið ymiskar, men tað sum tíverri hevur eyðkent politiska landalagið hevur verið at "lata standa til politikkur". Samgongan millum hesar báðar flokkar má sigast at hava verið eitt politiskt eksperiment, sum fullkomiliga miseydnaðist, og tann sum gjørdist offur í hesum, tann sum serliga hevur merkt avleiðingarnar á sínum egna kroppi, er tann føroyski skattgjaldarin.

Arbeiðsloysið hevur verið støðugt vaksandi, fólk flytir av landinum sum ongantíð og ráðaloysið tykist at valda, har ið avgerðir átti at verið tiknar. Rætt er, at bæði flakavirkir, fiskifør, alingin, vinna og handil, landskassin, kommunurnar, peningastovnar, privatfólk kenna avleiðingarnar av kreppuni í dag og tí kann ein ikki verða ósamdur við Fólkaflokkinum, tá ið teir loksins í viðmerkingunum siga, at tað "ber ikki til at sita og bíða eftir, at okkurt hendir og so gera vit okkurt, tað er ikki statsmannahegnið, tað er ikki vanligur búskaparpolitikkur og tað er heldur ikki vanligt gonguvit". Her geva fólkafloksmenn sær sjálvum eitt skotsmál, tí tað má ásannast, at júst teir, sum umsitið hava fíggjar- og búskaparmál í landsstýrinum, tykjast at hava sitið og bíðað til okkurt hendi uttan at gera nakað sum helst. Sjálvt um tað undrar, at uppskot sum hetta kemur júst frá Fólkaflokki-

num, so kann ein ikki annað enn ásanna, at tað er neyðugt at gera tiltøk sum virka fremjandi upp á búskapin og harvið fólkið, sum her búleikast.

Kann ein skjótt arbeiðandi arbeiðsbólkur útgreina neyðug tiltøk til at økja um virksemið í samfelagnum og byggja upp aftur føroyska búskapin. so er tað vert at royna.

Samsvarandi hesum tekur tí minnilutin (Tordur J. Niclasen) tí undir við uppskotinum, tó við tí treyt, at eingin fólkfloksspolitikari og eingin javnaðarpolitikari fær sætið í hesum arbeiðsbólki.

Í staðin fyri uppskot Fólkafloksins verður tí sett fram soljóðandi:

## Uppskot

## til

## samtyktar

Løgtingið og landsstýrið seta í felag ein skjóttarbeiðandi arbeiðsbólk við 4-6 limum at útgreina neyðug tiltøk til at økja um virksemið í samfelagnum og byggja uppaftur føroyska búskapin.

Eingin fólkaflokspolitikari ei heldur nakar javnaðarflokspolitikari hava sætið í hesi nevnd.

# 193. Broytingar í útvarps-gjaldsskipanini

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at fremja neyðugar broytingar í útvarpsgjaldsskipanini soleiðis, at útvarpsgjaldið kann rindast í fýra pørtum.

**Viðmerkingar:**

Fyri stuttum fingu húski kring landið sendandi uppkrav um útvarpsgjald.

Útvarpsgjaldið fyri húsarhald 1993 er sett til kr. 900,-. MVG og avgreiðslugjald íroknað er talan um 1.114,38 kr., ið gjaldast skulu innan 1. juni 1993.

Lógin um útvarp heimilar, at útvarpsgjaldið og cykagjald (kr. 50,-) kunnu innheintast við panting.

Nógv húski hava fingið meiri enn tað eina uppkravið. Hetta í samband við lurtaratól í bili, báti v.m.

Undirritaði hevur áður havt uppskot um, at bert eitt gjald var galdandi fyri hvørt húsarhald.

Tíanverri vann uppskotið ikki frama.

Í hesum tíðum, har mong hava trupult at fáa endarnar at røkka, verður hildið rætt og rímuligt, at møguleiki hjá fólki verður givin, at útvarpsgjaldið kann rindast í t.d. fýra pørtum.

Slík skipan ger tað lættari hjá fólki at gjalda og virkar helst til, at Ú.F. fyri árið fær meginpartin av gjaldinum inn.

Fjórða gjald skuldi t.d. verið goldið í seinasta lagi 1. desember 1993.

Skal slík skipan setast í verk, verður neyðugt við broytingum í "kunngerð um útvarpsgjald", og verður tí skotið upp, at landsstýrið tekur neyðug stig til hetta soleiðis, at skipanin kemur at galda fyri útvarpsgjøld, ið falla til gjaldingar í 1993.

Sama skipan eigur sjálvandi eisini at galda fyri sjónvarpið.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 193/1992: Broytingar í útvarpsgjaldsskipanini.*

Málið varð lagt fram av Tordi J. Niclasen, løgtingsmanni tann 5. mai 1993 og eftir 1. viðgerð 10. mai 1993 beint í fíggjarnevndina.

Í uppskoti til samtyktar mælir uppskotsstillarin til, at útvarpsgjaldið verður goldið í fýra pørtum, og í viðmerkingunum verður sagt, at sama skipan sjálvandi eisini eigur at galda fyri sjónvarpsgjaldið. Nevndin er vitandi um, at útvarpið eisini arbeiðir við sama spurningi.

Nevndin hevur viðgjørt málið.Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta. Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Hergeir Nielsen, Asbjørn Joensen og Finnbogi Arge) tekur undir við uppskotinum, men ásannar, at av tí, at rokningarnar fyri útvarpsgjaldið longu eru sendar út og sum skuldu vera goldnar í seinasta lagi 1. juni, er møguleiki ikki fyri at seta hesa skipan í gildi fyri árið 1993.

Meirilutin mælir tí til, at landsstýrið tekur neyðug stig, soleiðis at útvarpsgjaldið og sjónvarpsgjaldið frá og við 1994 verða kravd inn við fleiri árligum gjøldum, og at henda skipan verður løgd soleiðis til rættis, at útvarpsgjald og sjónvarpsgjald ongantíð falla til gjaldingar samstundis.

Um t.d. einki útvarps- og sjónvapsgjald verður kravt í desember og januar og heldur ikki í juni og juli, so verða átta mánaðair eftir. Hesar mánaðar kundu so útvarpið og sjónvarpið kravt síni gjøld inn aðruhvørja ferð. Hetta vildi gørt tað lættari hjá brúkarunum og vildi samstundis tryggja báðum stovnum javnari inntøku gjøgnum árið.

Út frá hesum setir meirilutin fram soljóðandi:

## Uppskot

## til

## samtyktar

"Heitt verður á landsstýrið um, at gera neyðugar kanningar við tí fyri eyga, at broyta avvarðandi kunngerðir soleiðis, at útvarpsgjaldið og sjónvarpsgjaldið frá og við 1994 verða kravd inn við fleiri árligum gjøldum".

Minnilutin (Tordur J. Niclasen og Anfinn Kallsberg) mælir í fyrstu syftu til, at samtykkja fyriliggjandi uppskot til samtyktar, í øðrum lagi verður tikið undir við uppskoti meirilutans.

# 194. Lækkan av útvarps-, sjónvarps- og telefonfelagagjaldi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrinum frá fíggjarárinum 1994 at broyta innkrevjingarháttin av útvarps-, sjónvarps- og telefonfelagagjøldum, uttan at hesi annars hækka, soleiðis:

**Útvarpsgjald:**

1. Bert eitt útvarpsgjald verður at rinda fyri hvørt húski, og einki gjald fyri bilradio.
2. Fólka- og avlamispensionistar í egnum bústaði rinda hálvt gjald.

**Sjónvarpsgjald:**

Fólka- og avlamispensionistar í egnum bústaði rinda hálvt gjald.

Telefonfelagagjald:

Fólka- og avlamispensionistar í egnum bústaði rinda helvtina av fasta telefonfelagagjaldinum.

**Viðmerkingar:**

Tíðin er farin frá einum útvarpsgjaldi fyri hvørt lurtitól, og mett verður ikki, at tað er rætt at fólk, ið kanska verða noydd at hava ein bil til tess at koma til arbeiðis, skulu gjalda eyka um lurtitól er í bilinum.

Fólka- og avlamispensionistar eru tann samfelagsbólkur, sum í mun til inntøkumøguleikar er harðast raktur av vaksandi gjøldum, og mett verður tí, at tað er rætt at lækka gjøldini fyri tey.

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið rokniskapirnar hjá omanfyri nevndu stovnum og meta, at teir eisini eru førir fyri at eiga at tillaga sítt virksemi til fíggjarligu gongdina í samfelagnum eins og aðrir almennir stovnar, ið beinleiðis eru á fíggjarlógini.

# Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 194/1992: Lækkan av útvarps-, sjónvarps- og telefonfelagagjaldi.*

Málið er lagt fram av løgtingsgrannskoðarunum tann 6. mai 1993 og eftir 1. viðgerð tann 11. mai 1993 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og sær seg ikki føra fyri at koma við endaligum áliti í hesi tingsetuni. Orsøkin til hetta er, at nevndin ikki hevur nakra hóming av, hvørjar avleiðingar uppskotið kann fáa fyri rakstrarúrslitið hjá stovnunum, um hetta verður samtykt. Her verður serliga hugsað um Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya.

Ein meiriluti (Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Asbjørn Joensen, Hergeir Nielsen, Anfinn Kallsberg og Finnbogi Arge) mælir til, at fíggjarnevndin arbeiðir víðari við málinum sum millumtinganevnd, og soleiðis fær høvið til at halda fund við umboð fyri avvarðandi stovnar, fyri harvið at fáa eina hilling á, hvørjar tær fíggjarligu avleiðingarnar koma at verða fyri nevndu stovnar, um hjálagda uppskotið frá løgtingsgrannskoðarunum verður samtykt.

Nevndin ger eisini vart við, at tá talan er um útvarpsgjaldið og sjónvarpsgjaldið, so er eingin møguleiki fyri, at broytingin kann verða galdandi fyri árið 1993. Nakrar av uppskotnu broytingunum krevja lógarbroyting. Og sum nevndin eisini hevur víst á í løgtingsmáli nr. 193, so eru rokningarnar fyri útvarpsgjald og sjónvarpsgjald longu sendar út.

Út frá frammanfyri standandi setir meirilutin fram soljóðandi:

## Uppskot

## til

## samtyktar

"Løgtingið samtykkir, at fíggjarnevndin sum millumtinganevnd arbeiðir víðari við løgtingsmáli nr. 194/1992: Lækkan av útvarps-, sjónvarps- og telefonfelagagjaldi, og leggur fram álit í komandi tingsetu."

Minnilutin (Tordur J. Niclasen) vísir á, at hann fyri meir enn ári síðani, legði uppskot fyri tingið (løgtingsmál nr. 146/1991), sum hevði til endamáls at húsarhald bert komu at rinda tað eina gjaldið.

Uppskotið fekk ikki meiriluta á tingi.

Tí er tað nú at fegnast yvir, at tey sjónarmið, sum tá vórðu førd fram, nú verða tikin framaftur, og at løgtingsgrannskoðararnir líkasum hava umhugsað støðuna av nýggjum.

Ásannandi, at uppskot løgtingsgrannskoðarana hevur til endamáls:

1. Fólka- og avlamispensionistar í egnum bústaði rinda hálvt útvarpsgjald.
2. Fólka- og avlamispensionistar í egnum bústaði rinda hálvt SVF gjald
3. Fólka- og avlamispensionistar í egnum bústaði rinda helvtina av fasta telefongjaldinum, undrar tað minnilutan, at eingi tøl (kr. og oyru) eru løgd við uppskotinum soleiðis, at greiðliga sæst, hvørjar avleiðingar verða og hvussu virksemi stovnana verður ávirkað av ætlaðu broyttu skipanini. Hin vegin, gera løgtingsgrannskoðararnir vart við, at teir meta, at nevndu stovnar eru førir fyri at tillaga sítt virksemi til fíggjarligu gongdina í samfelagnum eins og aðrir almennir stovnar, ið beinleiðis eru á fíggjarlógini.

Minnilutin (Tordur J. Niclasen) hevur ikki broytt støðu til spurningin um, at húsarhald bert gjalda tað eina útvarpsgjaldið, ásannandi skatta- og avgjaldsbyrðarnar, ið hava verið og verða lagdar á pensionistarnar, tekur minnilutin somuleiðis undir við at broytingar verða gjørdar pensionistunum til frama.

Í fyrsta lagi tekur minnilutin undir við uppskotinum til samtyktar.

Í øðrum lagi verður tikið undir við uppskotinum til samtyktar frá fíggjarnevndini.

# 195. Broyting í løgtingslóg um veðhald fyri lánum til frysti- og flakavirkir

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um veðhald fyri lánum til frysti- og flakavirkir.*

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 35 frá 20. mai 1988 um veðhald fyri lánum til frysti- og flakavirkir við seinni broyting verður gjørd henda broyting:

Sum nýggj § 2 B verður sett:

"§ 2 B. Landsstýrinum er heimilað í sambandi við eina skipaða skuldarsanering í 1993 av fiska- og flakavirkjunum, at góðkenna, at lán sum landskassin veðheldur fyri verða strika heilt ella fyri ein part, verða umløgd, ella yvirtikin av øðrum skuldara.

**Stk. 2.** Landsstýrinum er heimilað í samband við saneringina eftir stk. 1, at strika heilt ella fyri ein part veðhaldsútlegg og onnur lán til fiska- og flakavirkir, ella at geva loyvi til, at hesi verða umløgd ella yvirtikin av øðrum skuldara."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

*lagtingslov om ændring i lagtingslov om garanti for lån til fryse- og filétanlæg.*

§ 1.

I lagtingslov nr. 35 af 20. maj 1988 om garanti for lån til fryse- og filétanlæg med senere ændringer foretages følgende ændring:

Som ny § 2 B indsættes:

"§ 2 B. Landsstyret bemyndiges til i forbindelse med en organiseret gældsanering i 1993 af fiske- og filétanlæg at godkende, at lån som landskassen garanterer for, bliver eftergivet helt eller delvis, bliver omlagt eller overtaget af anden debitor.

**Stk. 2.** Landsstyret bemyndiges til, i forbindelse med saneringen efter stk. 1, at eftergive helt eller delvis garantiudlæg og andre lån til fiske- og filétanlæg, eller at give tilladelse til, at disse bliver omlagt eller overtaget af anden debitor."

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

**Viðmerkingar:**

Landsstýrið hevur við løgtingsmáli nr. 159/1992 lagt uppskot fram um at avtaka løgtingslóg nr. 28 frá 30. apríl 1987 um eftirgeving av ella gjaldsskipan fyri skuld til landskassan.

Tá konkurslógin kom í gildi í 1989, kom eisini skuldarumskipan (gældsanering) í gildi í Føroyum, og var tí hildið rættari at avtaka 1987-lógina.

Síðani lógaruppskotið varð lagt fram, eru ætlanir um at endurreisa (sanera) fiskavirkir og flakavirkir samtyktar, soleiðis at fíggjarstovnar avskriva møguliga niðurfrysta skuld.

Um lóg nr. 28 frá 30/4-1987 fer úr gildi, hevur landskassin onga heimild at avskriva skuld til landskassan, uttan virkið fer á húsagang ella verður selt á tvingsilssølu, tí verður uppskot lagt fram um, at landskassin í 1993 kann verða við í saneringini av flakavirkjum.

## Álit

### í

*løgtingsmáli nr. 195/1992: Broyting í løgtingslóg um veðhald fyri lánum til frysti- og flakavirkir.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 6. mai 1993 og eftir 1. viðgerð tann 11. mai beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið. Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og tvcir minnilutar.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Frank Davidsen, Hergeir Nielsen og Asbjørn Joensen) vísir á, at endamálið við lógaruppskotinum er, at landsstýrið, saman við føroysku peningastovnunum og donsku kredittfeløgnum, skal hava møguleika fyri at medvirka í teirri sanering, sum fara skal fram í føroyska vinnulívinum, serstakliga innan fiskiídnaðin.

Eftir uppskotinum verður lógin tíðaravmarkað til at galda fyri árið 1993. Hetta heldur meirilutin verða rímiligt, tá ætlanin er, at saneringin skal fara fram skjótt og undir einum. Um øll saneringin ikki verður framd í ár, heldur meirilutin tað verða nátúrligt at taka spurningin upp av nýggjum seinni, møguliga við tí fyri eyga, at framleingja lógina eitt ávíst tíðarskeið.

Meirilutin kann ikki taka undir við, at heimildin til heilt ella lutvíst at strika lán, sum landskassin veðheldur fyri, at umleggja hesi ella at lata aðrar skuldarar yvirtaka lánini, skal liggja hjá landsstýrinum einsamøllum. Slík heimild hevur altíð áður ligið hjá landsstýrinum og fíggjarnevndini.

Meirilutin mælir tí til, at § 2 B verður orðað soleiðis, at heimildin verður hjá landsstýrinum og løgtingsins fíggjarnevnd og setir fram soljóðandi:

**Broytingaruppskot**

**til**

**uppskot landsstýrisins**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1) | Í § 1 verður í stk. 1 sett aftan á Landsstýrinum:<br>"og løgtingsins fíggjarnevnd". | 1) | I § 1 stk. 1 indsættes efter Landsstyret:<br>"og lagtingets finansudvalg". |
| 2) | Í § 1 verður í stk. 2 sett aftan á Landsstýrinum:<br>"og løgtingsins fíggjarnevnd". | 2) | I § 1 stk. 2 insættes efter Landsstyret:<br>"og lagtingets finansudvalg". |

Minnilutin (Finnbogi Arge og Tordur J. Niclasen) kann bert taka uudir við fyriliggjandi uppskoti, um lógin gevur heimildina til ein kvalifiseraðan meiriluta í fíggjarnevndini.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg) tekur ikki undir við fyriliggjandi máli og vísir til viðmerkningar sínar í løgtingsmáli nr. 159/1992: Avtøka av løgtingslóg um eftirgeving av ella gjaldsskipan fyri skuld til landskassan.

# 196. Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.*

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður gjørd henda broyting:

Í § 33 verður sum nýtt nr. 11 sett:

"Í mesta lagi 10.000 kr. árliga av lønarútreiðslum í sambandi við umvæling og umbygging av egnum bústaði, treytað av, at arbeiðið er gjørt av virki, ið er meirvirðisgjaldsskrásett sambært reglunum í løgtingslóg um meirvirðisgjald. Frádrátturin kann í mesta lagi verða 10.000 kr. árliga pr. bústað. Um bústaðurin er ogn hjá meir enn einum skattgjaldara, verður frádrátturin at býta í sama lutfalli, sum eigaraviðurskiftini eru. Landsstýrinum verður heimilað við kunngerð at áseta nærri reglur fyri, hvat er at skilja við umvæling og umbygging og fyri umsitingina av hesum reglum."

**§ 2.**

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og er bert galdandi í 1993 og 1994.

*lagtingslov om ændring i lagtingslov og landsskat og kommuneskat.*

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændring:

I § 33 indsættes som nyt nr. 11:

"Højst 10.000 kr. årligt af lønudgifter i forbindelse med istandsætning og ombygning af egen bolig, betinget af, at arbejdet er udført af en virksomhed, der er merværdisregistreret i henhold til reglerne i lagtingslov om merværdiafgift. Fradraget kan højst udgøre 10.000 kr. årlig pr. bolig. Såfremt boligen ejes af mere end en skatteyder, bliver fradraget at fordele i samme forhold, som ejendomsforholdene er. Landsstyret bemyndiges til i bekendtgørelse at fastsætte nærmere regler for, hvad der skal forstås med istandsætning og ombyg-ning og for administrationen af disse regler."

**§ 2.**

Denne lagtingslov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen og har kun gyldighed i 1993 og 1994.

**Viðmerkingar:**

Fyriliggjandi uppskot landsstýrisins til broyting í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt er eitt uppskot um at heimila sethúsaeigarum partvísan frádrátt fyri útreiðslur í sambandi við umvæling og umbygging av bústaði teirra.

Landsstýrið metir, at tað er alneyðugt at fáa fleiri arbeiði sett í gongd, so fleiri hendur harvið kunnu koma í arbeiði skjótast gjørligt. Landsstýrið metir, at uppskotið kann verða ein stimbran av eftirspurninginum á handverksarbeiði.

Við uppskotinum fáa sethúsaeigarar, ið skulu gera ábøtur á bústaðin, betri fíggjarligar møguleikar at fáa hetta arbeiði gjørt av øðrum, og skuldi uppskotið sostatt ført til, at fleiri fólk komu í arbeiði. Fyri at kunna hava eitt betri eftirlit við skipanini, setir landsstýrið harumframt sum treyt fyri frádráttinum, at arbeiðið er gjørt av einum meirvirðisgjaldsskrásettum virki.

Frádrátturin er ásettur til at vera í mesta lagi 10.000 kr. (uttan meirvirðisgjald) árliga pr. bústað og er tíðaravmarkaður til bert at galda í 1993 og 1994. Um fleiri eiga bústað saman, verður frádrátturin býttur teirra millum.

Frádráttarupphæddin er bert fyri lønarútreiðslur og bert fyri sjálva lønina, t.v.s. ikki fyri tilfar og meirvirðisgjaldið.

Ofta kann vera trupult at meta um, hvat er at rokna sum nýbygging, og hvat er umvæling og umbygging. Sum meginregla kann sigast, at aðalmálið er frádráttur fyri umvælingar og umbyggingar á bygd sethús, meðan nýbygging ikki kemur undir frádráttarreglurnar. Fyri at fáa eina neyvari útgreinan av reglunum verður heimilað landsstýrinum við kunngerð at gera neyvari reglur.

## Álit

í

*løgtingsmáli nr. 196/1992: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 6. mai 1993 og eftir 1. viðgerð tann 10. mai 1993 beint í skattanevndina.

Uppskotið er ein roynd hjá landsstýrinum at fáa fleiri fólk í arbeiði ongantíð ov skjótt.

Nevndin hevur viðgjørt uppskotið eisini saman við umboðum fyri Toll- og Skattstovuni og leggur dent á, at henda lóg, sum skal koma í gildi beinanvegin aftan á samtykt, fær ávirkan sum ætlað. Sostatt eigur arbeiðið, ið er gjørt áðrenn lógargildi, ikki at vera umfatað av hesi lóg.

Eisini verður gjørt vart við, at útreiðslur eftir hesi lóg skulu skjalprógvast saman við sjálvuppgávuni, (tilfarskeyp somulciðis).

Í viðmerkingum sínum til uppskotið sigur landsstýrið, at neyvari reglur verða settar av landsstýrinum, sum eisini fær heimild at gera reglugerð. Nevndin heldur tað vera bráðneyðugt, at neyv reglugerð verður gjørd beinanvegin.

Ein samd skattanevnd tekur undir við uppskotinum.

# 197. Løgtingsins umboðsmaður

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

1. Álagt verður formansskapi løgtingsins at lýsa eftir og seta eitt fólk við góðum kunnleika til samfelags- stats- og fólkarætt til at gera reglur fyri ein løgtingsins umboðsmann.

Samsvarandi úrslitinum av hesum starvi verður álagt formansskapinum at lýsa eftir og seta løgtingsins umboðsmann í starv áðrenn Ólavsøku í ár.

**Viðmerkingar:**

Tá tað er við at gerast dagligur kostur, at politikkarar, og serliga landsstýrismenn, verða skuldsettir fyri lógarbrot, og ongar veruligar royndir verða gjørdar fyri at reka hesar skuldsetingar aftur, verður hildið, at føroyska fólkaræðið er komið í ein ávísan vanda.

Almennir og privatir fjølmiðlar koma í heilum við dulnevndum og navngivnum ákærum móti almennu umsitingini og landsins stýri, sum í alt ov lítlan mun letur við seg koma, men roynir at tiga hesar burtur.

Støðan er tí hon, at maðurin á gøtuni stendur rættiliga ivingarsamur um heimildirnar í mongum avgerðum, sum tiknar eru. Sama kann í ávísan mun sigast um manninngina innan tinggátt.

Hildið verður, at løgtingið, sum tað evsta valdið, ikki kann lata sær lynda, at skiftandi landsstýris- og løgmenn tulka tingsins avgerðir eftir egnum høvdi.

Tí eigur løgtingið sum skjótast at fáa sett ein óheftan løgtingsins umboðsmann, sum kann tryggja løgtinginum og samfelagnum øllum móti skeivum og tilvildarligum avgerðum.

Fyri at byggja borð móti báru og soleiðis ansa eftir, at tað sindrið, vit eiga eftir av føroyskum fólkaræði, verður lív lagað framyvir, heldur Tjóðveldisflokkurin,

at tað er í tøkum tíma, at løgtingið og samfelagið alt fær kunnleika um og tryggleika fyri, at evsta valdið, sum er løgtingið, veruliga er evsta vald her á landi.

Víst verður eisini til tingmál nr. 17/1978, 74/1979 og 74/1980.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 197/92: Løgtingsins umboðsmaður.*

Málið er lagt fram av Tjóðveldisflokkinum tann 17. mars 1992 og eftir 1. viðgerð tann 24. mars 1992 beint í rættarnevndina. Løgtingið samtykti tann 2. juni 1992 at biðja rættarnevndina viðgera málið sum millumtinganevnd og leggja fram álit í ólavsøkutingsetuni.

Rættarnevndin hevur havt fund við Karin Kjølbro, formaðurin fyri arbeiðsbólkinum, sum landsstýrið setti at viðgera málið, ið hevur kunnað nevndina um søguligu gongdina í hesum spurningi og greitt frá, hvat er farið fram í málinum í formansstíð hennara og hevur Karin Kjølbro latið nevndini tilfar um málið, sum kann verða til nyttu fyri tann, ið skal taka sær av setninginum. Eisini hevur nevndin havt fund við Jalgrim Hilduberg, skrivstovustjóra í landsstýrinum, sum gav nevndini eina ábending um, hvat tíð tað kann taka at smíða tað neyðuga lógarverkið.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar og nevndin heldur, at tað ber til at fáa avgreitt lógarverkið rímiliga skjótt og er samd um, at heita má verða gjørt innan 1. oktober 1993.

Meirilutin (Mikkjal Sørensen, Hergeir Nielsen og Helena Dam á Neystabø) er samdur um at betra loysnin er, at formansskapur løgtingsins setir fólkið, hvørs høvuðsuppgáva verður at samskipa neyðugt lógartilfar.

Samsvarandi hesum setir nevndi meiriluti fram soljóðandi:

## Uppskot

## til

## samtyktar

Álagt verður formansskapi løgtingsins at seta eitt fólk við góðum kunnleika til samfelags-, stats-, og fólkarætt til at samskipa neyðugt lógartilfar fyri ein løgtingsins umboðsmann og at stovnseta starvið í hesum ári.

Ein minniluti (Lisbeth L. Petersen) tekur ikki undir við tí partinum av uppskotinum til samtyktar ið snýr seg um at stovnseta starv í hesum sparitíðum og nú so nógv onnur fólk verða uppsøgd.

Ein minniluti (Birgir Danielsen) teku ikki undir við uppskoti meirilutans tí:

- hóast málið hevur verið í rættarnevndini í nærum 14 mánaðar, er málið ikki lýst nóg gjølla.
- minnilutin metir, at hetta lætt kann gerast ein stór útreiðsla fyri landskassan uttan at fáa virðir aftur fyri - minnilutin metir eisini, at tað kann gerast sera torført í einum so lítlum samfelag sum tí føroyska at finna egnaðan(ar) persón(ar) við tí neyðuga neutraliteti at røkja eina so krevjandi uppgávu.

# 198. Løgtingslóg um býtið av almannaútreiðslum v.m.

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um býtið av almannaútreiðslum v.m.*

*lagtingslov om fordeling af sociale udgifter m.m.*

**§ 1.**

*Lógin fevnir í § 2 um útreiðslur av:*

1) útgoldnari fólkapensión við viðbótum sambært "Lov for Færøerne om folkepension",
2) útgoldnari avlamispensión og avlamisveiting við viðbótum sambært "Lov for Færøerne om invalidepension m.v."
3) útgoldnari einkjupensión við viðbótum sambært "Lov for Færøerne om offentlig forsorg",
4) barnaforsorgarútreiðslur sambært § 43, stk. 2 og 3 í "Lov for Færøerne om børneforsorg",
5) útgoldnari hjálp til einstaklingar sambært "Lov for Færøerne om offentlig forsorg",
6) heimahjálparaskipanini sambært "Lov for Færøerne om offentlig

**§ 1.**

*Loven omfatter i § 2 udgifter af:*

1) udbetalt folkepension samt tillæg jvf. Lov for Færøerne om folkepension.
2) udbetalt invalidepension, invaliditetsydelse samt tillæg jvf. Lov for Færøerne om invalidepension m.v.
3) udbetalt enkepension samt tillæg jvf. Lov for Færøerne om offentlig forsorg,
4) børneforsorgsudgifter jvf. § 43, stk. 2 og 3 i Lov for Færøerne om børneforsorg,
5) udbetalt hjælp til enkeltpersoner jvf. "Lov for Færøerne om offentlig forsorg",
6) hjemmehjælpsordningen jvf. Lov for Færøerne om offentlig forsorg,

forsorg", og av heilsu- og heimasjúkrasystraskipanini,

7) útgoldnari veiting sambært "Lov for Færøerne om børnebidrag til enlige forsørgere m.v.",

8) til rakstur av røktar-, ellis- og vistarheimum, og

9) til rakstur av stovnum sambært § 32, stk. 2 í "Lov om Færøerne om offentlig forsorg".

samt til sundhedsplejerske- og hjemmesygeplejerskeordningen,

7) udbetalt ydelse jvf. Lov for Færøerne om børnebidrag til enlige forsørgere m.v.,

8) driftsudgifter vedrørende alderdoms- og plejehjem og særlige plejehjem,

9) driftsudgifter vedrørende institutioner jvf. § 32, stk. 2 i Lov for Færøerne om offentlig forsorg.

**§ 2.**

Av útreiðslunum sambært § 1 verða 93,25 % goldin úr landskassanum og kommunurnar gjalda 6,75 %.

**Stk. 2.** Landskassin leggur út kommunanna part, og fær hann afturgoldnan soleiðis, at seinast 1. apríl hvørt ár verður gjørt upp, hvussu nógv landskassin skal hava aftur frá hvørjari kommunu sær fyri farna fíggjarárið, við at 50 % verða roknað eftir seinasta fólkatali og 50 % eftir skattainntøkuni í kommununi seinasta ár. Kommunurnar rinda teirra part í seinasta lagi 1. september í árinum, sum uppgjørt er.

**§ 2.**

Af udgifterne jvf. § 1 udreder landskassen 93,25 % og kommunerne 6,75 %.

**Stk. 2.** Landskassen udlægger kommunernes andel og får den refunderet således, at senest 1. april hvert år udregnes, hvor meget landskassen skal have refunderet fra hver enkelt kommune for det forløbne finansår, derved at 50 % pålignes efter sidste folketal og 50 % efter sidste års skatteindtægt i kommunen. Kommunerne betaler deres andel senest 1. september i det år, opgørelsen foretages.

**§ 3.**

Av rakstrarútreiðslunum til røktar- og ellisheim verða 15 % goldin av teimum luttakandi kommunum. Síðani verður vísandi til § 1, nr. 8, býtt samsvarandi tí í § 2 ásetta býtinum soleiðis, at 6,75 % verða býtt millum allar kommunur, og landskassin rindar 78,25 %.

**§ 3.**

For alderdoms- og plejehjem gælder dog, at de deltagende kommuner afholder 15% av driftsudgifterne. Herefter fordeles i medfør af § 1, nr. 8 i henhold til bestemmelserne i § 2, således at 6,75 % fordeles mellem samtlige kommuner, og landskassen afholder 78,25 %.

**§ 4.**

Av húsaútreiðslum til dagstovnar fyri børn o.l. sambært § 43, stk. 1, 2. pkt. í

**§ 4.**

For daginstitutioner for børn o.l. jvf. § 43, stk. 1, 2. pkt. gælder dog, at vedkom-

barnaforsorgarlógini, verða 40 % goldin av viðkomandi kommunu/kommunum. Landskassin rindar 60 %.

§ 5.

Kommunurnar rinda sjálvar umsitingarútreiðslurnar hjá kommunalum sosialum deildum sambært forsorgarlógina.

§ 6.

Útreiðslur sambært almannalóggávuni annars verða rindaðar av landskassanum.

§ 7.

Av rakstrarútreiðslunum til Heimarøktina (heimahjálpar-, og heilsu- og heimasjúkrasystraskipanin) verða fyrst 24 % rindaði av landskassanum. Síðani verður restupphæddin vísandi til § 1, nr. 6, býtt samsvarandi tí í § 2 ásetta býtinum.

**Stk. 2.** Kommunurnar útvega høli til heimarøktina og skúlalæknaskipanina.

§ 8.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og verður galdandi frá og við fíggjarárinum 1993.

**Stk. 2.** Samstundis fer løgtingslóg nr. 3 frá 6. januar 1983 um býti av útreiðslunum til heimasjúkrasystra-, heilsusjúkrasystra- og skúlalæknaskipanina og løgtingslóg nr. 98 frá 23. juni 1992 um býti av almannaútreiðslunum úr gildi.

mende kommune/kommuner afholder 40 % af ejendomsudgifterne. Landskassen afholder 60 %.

§ 5.

Kommunernes administrationsudgifter vedrørende kommunale socialforvaltninger i henhold til forsorgsloven afholdes af dem selv.

§ 6.

Udgifter i medfør af den sociale lovgivning i øvrigt afholdes af landskassen.

§ 7.

For Hjemmeplejen (hjemmehjælps-, og sundhedsplejerske- og hjemmesygeplejerskeordningen) gælder dog, at 24 % av driftsudgifterne afholdes forlods af landskassen. Herefter fordeles det resterende beløb i medfør af § 1, nr. 8 i henhold til bestemmelserne i § 2.

**Stk. 2.** Kommunerne tilvejebringer lokaler til Hjemmeplejen og skolelægeordningen.

§ 8.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse, og finder anvendelse fra og med finansåret 1993.

**Stk. 2.** Samtidig ophæves lagtingslov nr. 3 af 6. januar 1983 om fordeling af udgifterne til hjemmesygeplejerske-, sundhedsplejerske- og skolelægeordning samt lagtingslov nr. 98 fra 23. juni 1992 om fordeling af sociale udgifter.

**Viðmerkingar:**

Við blokkstuðulsskipanini pr. 1. juli 1993 verða veitingarreglurnar viðvíkjandi endurrindan frá danska ríkiskassanum broyttar soleiðis, at allur danski stuðulin til almannaútreiðslur í Føroyum verður rindaður sum blokkstuðul.

Í galdandi løgtingslóg um býtið av almannaútreiðslum er føroyski parturin av útreiðslunum grundarlagið fyri býtinum millumm landskassan og kommunurnar. Av tí at føroyski parturin er bruttoútreiðslurnar frádrigið endurrindan frá danska ríkiskassanum, er tí neyðugt at gera broytingar í galdandi lóg fyri at tillaga hana til broyttu støðuna.

Eins og tá, ið núgaldandi býtislóg varð gjørd í 1992, so hevur høvuðsdenturin verið lagdur á, at útreiðslustøðið hjá kommununum verður hildið á sama støði sum áður. Lógaruppskotið førir sostatt stórt sæð onga broyting fyri samlaða útreiðslustøðið hjá kommununum við sær.

Eins og í galdandi býtislóg eru tað ávís økir, har kommunurnar ikki luttaka í rindanini av útreiðslunum, so sum t.d. dagpeningaøki, Andveikravernd, brennistudningur og samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima.

Sambært fyribilsrokniskapinum hjá Almannastovuni fyri 1992 vóru samlaðu útreiðslurnar sambært almannalógunum kr. 883.293.946,-.

Kommununnar partur av hesum eftir galdandi skipan er kr. 43.395.040,-. Um býtt varð sambært fyriliggjandi uppskoti hevði kommununnar partur av almannaútreiðslunum í 1992 verið umleið kr. 42.715.290,-, tvs. ein lækking av kommununnar parti upp á kr. 679.750,-.

Sambært fíggjarætlanini fyri 1993 eru samlaðu útreiðslurnar sambært almannalógunum kr. 834.931.876,-. Um býtt varð eftir núgaldandi lóg, hevði kommununnar partur av hesum verið kr. 40.290.610,-. Og sambært fyriliggjandi uppskoti verður kommununnar partur av almannaútreiðslunum í 1993 kr. 40.987.285,-, tvs. ein hækking av kommununnar parti upp á kr. 696.675,-.

Hóast heimahjálparskipanin og heilsu- og heimasjúkrasystraskipanin í ár verða lagdar saman í eina skipan, sum verður nevnd heimarøktin, so koma kommunurnar ikki at rinda part av útreiðslunum til heilsu- og heimasjúkrasystraskipanina. Í § 7 í uppskotinum er ásett, at av rakstrarútreiðslunum til heimarøktina verða fyrst 24 % rindað av landskassanum. Hesi 24 % svara til rakstrarútreiðslurnar til heilsu- og heimasjúkrasystraskipanina.

Síðani verður restupphæddin, ið er játtanin til heimahjálparskipanina, býtt millum landskassan og kommunurnar samsvarandi tí í § 2 í uppskotinum ásetta býtinum.

Nú allur stuðulin innan almannaøkið er fluttur í blokkstuðulsskipan, er tað landsstýrisins áskoðan, at hetta er eitt gott høvi til at gera útreiðslubýtið millum landskassan og kommunurnar nakað nógv einfaldari enn í dag. Landsstýrið metir

tað skilagott, at býtið varð ásett soleiðis, at kommununar rindaðu ávísan %-part av samlaðu almannaútreiðslunum í staðin fyri sum nú, at kommununar rinda innan nøkur øki og ikki innan onnur. Iletta kann gerast uttan at hækka útreiðslustøðið hjá kommununum við t.d at áseta at kommununnar partur er 4-5 % av samlaðu almannaútreiðslunum. Ætlan landsstýrisins er at leggja uppskot fram hesum viðvíkjandi í ólavsøkutingsetuni.

**Álit**

**í**

*løgtingsmáli nr. 198/1992: Løgtingslóg um býtið av almannaútreiðslum v.m.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 6. mai 1993 og eftir 1. viðgerð tann 10. mai 1993 beint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og við fyrivarni um broyttan kommunubygnað, mælir ein samd nevnd til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

# 199. Arbeiðsskapandi tiltøk

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Nevnd verður sett av landsstýrinum, ið fær sum arbeiðssetning, at koma við hugskotum/uppskotum um arbeiðsskapandi tiltøk.

Nevndin verður mannað við 10 limum, ið verða valdir soleiðis:

1 av Føroya Arbeiðarafelag
1 av Føroya Handverkarafelag
1 av Føroya Fiskimannafelag
1 av Føroya Ídnaðarfelag
1 valdur av Menningargrunninum
1 valdur av Búskaparráðnum
1 valdur av LFÚ
1 valdur av FUR
1 valdur av arbeiðsgevarum
1 frá Landsumsitingini, ið verður formaður.

Nevndin skal verða liðug við arbeiðið innan 1. august 1992.

**Viðmerkingar:**

Sambært hagtøl, so er talið av teimum, ið gerast arbeiðsleys, støðugt vaksandi.

Tølini fyri 1991 eru skelkandi. Samlaða talið av teimum, ið fingu útgoldið arbeiðsloysisstuðul í 1991 var 1001. Sama yvirlit vísir okkum, at tey í aldrinum 18 til 24 ár, 25 til 34 ár og tey í aldrinum 35 til 44 ár eru harðast rakt við ávikavist 272, 289 og 222.

Harafturímóti er talið av teimum, ið eru millum 45 og 54 ár væl lægri - 134, og tey ið eru 55 ár og eldri er 84 .

Nevndu tøl benda millum annað á, at tey, ið hava tær størstu fíggjarligu byrðarnar at bera, eru harðast rakt. Hugsað verður um tey, ið hava sett búgv, og sum hava stór og dýr lán at dragast við.

Upphæddirnar, ið eru útgoldnar í arbeiðsloysisstuðli, hava ongantíð verið so høgar, sum júst nú. Í 1990 vórðu útgoldnar tilsamans 18 miliónir kr., meðan talið fyri 1991 er komið uppá góðar 46 miliónir kr.

Lítið bendir á, at broyting kemur í á hesum øki í bræði. Nógv hevur verið talað og skrivað um at fáa samfelagshjólini at mæla aftur, men higartil hevu tað fyri størsta partin bert verið tóm orð. Í ávísum plássum í landinum, er støðan heilt hættislig - størsti parturin av fókinum hevur als einki at taka sær til. Hetta er ein ótolandi støða, sum fer at hava nógvar keðiligar avleiðingar við sær, um ikki vend kemur í.

Í framlagda uppskoti, verður mælt til at velja nevnd, ið skal kanna eftir, hvørjir møguleikar eru at skapa nýggj arbeiðspláss í landinum, soleiðis at talið av arbeiðsleysum minkar.

Hugsað verður fyrst og fremst um arbeiðir, ið kasta nakað av sær og bera í sær ein búskaparligan vøkstur fyri samfelagið.

Mælt verður til at velja tíggju limir í nevndina, ið umboða Føroya Arbeiðarafelag, Føroya handverkararfelag, Føroya Fiskimannafelag, Føroya Ídnaðarfelag, Menningargrunnin, LFÚ, FUR, Búskaparráðið og Landsumsitingina.

Tjóðveldisflokkurin mælir til, at vinnufeløgini - t. e. Føroya Arbeiðarafelag, Føroya Handverkarafelag og Føroya Fiskimannfelag ciga at verða umboðað í nevndini, tí limirnir innan nevndu feløg - serstakliga í tveimum teimum fyrst nevndu feløgunum - eru serliga hart raktir av arbeiðsloysinum, og hava vist á loysnir, ið kunnu bera í sær, at nøkur av teimum, sum í dag einki hava at taka sær til, kundu fingið arbeiði aftur.

Tey ungu í aldursbólkinum 18 - 24 ár eru hart rakt, og tí er rætt, at ungdómurin verður umboðaður í tilíkari nevnd.

Føroya Ídnaðarfelag og Menningargrunnurin hava nú í mong ár viðgjørt arbeiðsskapandi ætlanir, so tey skuldu við sínum drúgvu royndum havt allar fyritreytir at viðgjørt slíkt mál, ið uppskotið mælir til.

Hildið verður somuleiðis, at rætt er at hava eitt umboð fyri búskaparráðið, ið kann gera metingar um tann búskaparliga týdningin, ið møgulig uppskot frá nevndini hava. Somuleiðis verður hildið skilagott, at umboð fyri landsumsitingina verður við í nevndararbeiðnum.

Tjóðveldisflokkurin mælir til, at nevndin skal hava eina ásetta tíðarfreist at arbeiða í og til at leggja møgulig tilmæli fyri landsstýrið. Mælt verður til, at nevndin skal verða liðug við sítt arbeiði innan 1. august 1992.

Møgulig tilmæli, skulu umframt at verða løgd fyri landsstýrið, eisini verða býtt út til tingmenn, soleiðis at teir hava høvi at kunna seg um tey.

## Álit

## í

*løgtingsmáli nr. 199/1992: Arbeiðsskapandi tiltøk.*

Málini eru løgd fram soleiðis:

1. Løgtingsmál nr. 15/1991: Arbeiðsskapandi tiltøk sum fyribyrgjan av arbeiðsloysi, lagt fram tann 3. oktober 1991 av Tordi J. Niclasen og eftir 1. viðgerð tann 7. november 1991 beint í arbeiðaramálanevndina.
2. Løgtingsmál nr. 138/1991: Arbeiðsskapandi tiltøk, lagt fram av Tjóðveldisflokkinum tann 17. mars 1992 og eftir 1. viðgerð tann 20. mars 1992 beint í arbeiðaramálanevndina.
3. Løgtingsmál nr. 144/1992: Setan av nevnd í sambandi við loysn av arbeiðsloysistrupulleikanum her á landi, lagt fram tann 17. mars 1992 av Tordi J. Niclasen og eftir 1. viðgerð beint í arbeiðararmálanevndina.
4. Løgtingsmál nr. 154/1991: Tiltøk at minka um arbeiðsloysið lagt fram av Kristiliga fólkaflokkinum, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki tann 17. mars 1992 og eftir 1. viðgerð 20. mars 1992 beint í arbeiðaramálanevndina.

Arbeiðaramálanevndin legði fram felagsálit í hesum málum tann 6. apríl 1992, har nevndin setti fram soljóðandi uppskot til samtyktar: Arbeiðaramálanevndin verður millumtinganevnd, ið viðgerð tingmálini um arbeiðsskapandi tiltøk. Uppskotið fekk 2. viðgerð tann 9. apríl 1992 og varð samtykt við 24-0.

Ætlanin hjá arbeiðaramálanevndini var upprunaliga, at øll tey feløg, ið vóru skotin upp av Tjóðveldisflokkinum, skuldu velja umboð í nevnd, ið skuldi taka sær av málinum. Seinni varð hildið, at nevndin tá gjørdist ov stór, og tí varð avrátt at arbeiðaramálanevndin skuldi samstarvast við umboð fyri Føroya Fiskimannafelag, Føroya Arbeiðarafelag, Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Reið-

arafelag, ið síðani kundi seta seg í samband við onnur feløg í sambandi við viðgerðina av málinum.

Nevnast skal, at arbeiðaramálanevndin skipaði fyri fundi á Føroya Blindastovni um arbeiðsskapandi tiltøk, har eini 30 feløg vóru umboðað. Nevndin hevur fingið mong góð hugskot/uppskot, ið eiga at verða sett í verk.

Ætlan nevndarinnar var, at leggja fram fleiri uppskot í hesi tingsetu, men av tí, at samgongan ímillum Fólkaflokkin og Javnaðarflokkin skrædnaði, steðgaði arbeiðið upp í nevndini. Ein meiriluti í arbeiðaramálanevndini heldur, at rættast er nú at beina málið til landsstýrið, so at landsstýrið so tíðliga sum møguligt í ólavsøkutingsetuni, kann leggja fram uppskot um arbeiðsskapandi tiltøk.

Hugskot, sum eru viðgjørd í arbeiðaramálanevndini, eru millum onnur. Uppskotið um partapening í vinnufyritøkur, ið kann dragast frá í skatti.

Uppskot um at nýta bundnu uppsparingina til flegging í vinnuskapandi tiltøk.

Uppskot um at fara undir svarkjaftaveiðu aftur, veiða av gulllaksi, langasporli og havtasku.

Uppskot um bygnaðarbroyting (umstrukturering) av fiskivinnuni, við m.a. tí fyri eyga, at fleiri arbeiðspláss verða skapt.

Uppskot um eina betri marknaðarføring, uppskot um at framleiða sokallaði "nichuproduktir".

Soleiðis kundi verið hildið fram, at nevnt mál, ið eru umrødd í arbeiðaramálanevndini, men skulu vit steðga her.

Flestu broytingar, ið eru viðgjørdar í nevndini, eru kapitalkrevjandi, tí er neyðugt at finna útvegir fyri, at fáa pening út í samfelagið, so gongd fæst á aftur.

Meirilutin mælir til, at málið um arbeiðsskapandi tiltøk verður sent landsstýrinum, og setir fram soljóðandi:

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrinum at fara undir at fremja arbeiðsskapandi tiltøk beinanvegin, og har tað er neyðugt, at leggja fram uppskot á ting tíðliga í ólavsøkutingsetuni 1993, so verulig úrslit spyrjast burturúr, so skjótt sum møguligt.

# 200. Vegir og lendingar

**Álit**

**í**

*løgtingsmáli nr. 200/92: Vegir og lendingar.*

Samferðslunevndin hevur viðgjørt tær o.u. 195 umsóknirnar, sum innkomnar eru.

**A.**

**I: Vegir**

Á fíggjarløgtingslógini eru undir gr. 13.018 avsettar 4,5 mió. kr. til studningsvegir, og við tað at kommunurnar eiga á væl størri upphæddd enn hesa av áður játtaðum studningi, sum ikki er nýttur, setir nevndin fram soljóðandi:

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Ongin nýjáttan til hesi endamál verður í hesi tingsetuni.

Tær upphæddir, sum játtaðar eru frammanundan og enn ikki eru nýttar til ávís vegastrekki o.a., sum víst niðanfyri, kann bý/bygdaráð við vanligum meiriluta og við góðkenning frá Landsverkfrøðinginum, flyta til onnur arbeiði, sum gjørd verða framyvir, tó soleiðis, at tá ið talan er um at flyta studning frá einari bygd til aðra í somu kommunu krevst, at samt bý/bygdaráð tekur undir við hesum.

| Kommuna | Til | Játtað ár | 3/4 av kr. | Tils. 3/4 av kr. |
|---|---|---|---|---|
| Fugloyar | Dyrkingarveg norður í Vatnsdal | 1988 | 75.000 | |
| | Dyrkingarveg norður í Vatnsdal | 1990 | 75.000 | |
| | Dyrkingarveg norður í Vatnsdal | 1991 | 75.000 | 225.000 |
| Svínoyar | Líðugtgerð av vegnum út til bátahylin | 1988 | 100.000 | |
| | Veg á Gundavali | 1991 | 150.000 | 250.000 |
| Viðareiðis | Dyrkingarveg eystur við Egg | 1983 | 46.341 | 46.341 |
| | | | **at flyta** | 521.341 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | | | **flutt** | 521.341 |
| Hvannas. | Breiðking av vegi til skúlan | 1984 | 50.000 | |
| | Veg í samb. við alivinnu s.f. bygdina | 1987 | 126.035 | |
| | Bygdaveg í Norðdepli | 1987 | 100.000 | |
| | Breiðk. av vegi til skúlan á Fossanesi | 1987 | 100.000 | |
| | Breiðk. av vegi til skúlan á Fossanesi | 1988 | 200.000 | |
| | Vegagerð til skúlan á Fossanesi | 1988 | 75.000 | |
| | Vegagerð til skúlan á Fossanesi | 1989 | 150.000 | |
| | Bygdarveg í Norðdepli | 1990 | 75.000 | |
| | Vegagerð til skúlan á Fossanesi | 1990 | 75.000 | |
| | Vegagerð til skúlan á Fossanesi | 1991 | 150.000 | 1.101.035 |
| Klaksvíkar | Dyrkingarveg út í Torvadal | 1990 | 10.813 | 10.813 |
| Kunoyar | Veg í sambandi við iðnaðarøki í Kunoy | 1987 | 100.000 | |
| | Veg norður frá bygdini í Haraldsundi | 1989 | 75.000 | 175.000 |
| Mikladals | Dyrkingarveg á Trøllanesi | 1990 | 16.826 | |
| | Umb. av dyrkingarv. út á Glaðingarst. | 1991 | 38.808 | |
| | Umb. og nýg. av dyrkingarv. á Trøllan. | 1991 | 75.000 | 130.634 |
| Húsa | Veg til íbúðarøki á Húsum | 1986 | 127.599 | |
| | Útstykkingarveg á Húsum | 1987 | 100.000 | |
| | Útstykkingarveg á Húsum | 1989 | 100.000 | |
| | Dyrkingarveg niðan á Eið á Húsum | 1989 | 50.000 | |
| | Kloakk á Húsum og Syðradali | 1990 | 150.000 | 527.599 |
| Elduvíkar | Ábøtur á dyrkingarveg v.f. í Elduvík | 1985 | 70.000 | |
| | Búsetingarveg í Funningsfirði | 1991 | 50.000 | |
| | Liðugtg. av veg. frá kirkjug. í Elduvík | 1991 | 50.000 | 170.000 |
| Oyndarfj. | Útstykkingarveg norður í Bø | 1988 | 26.409 | |
| | Vegagerð norðuri í Bø | 1989 | 100.000 | 126.409 |
| Fuglafj. | Niðurgongd í Góðadal | 1985 | 16.853 | |
| | Niðurgongd í Góðadal | 1986 | 50.000 | |
| | Dyrkingarveg Vestur í Dal | 1989 | 50.000 | |
| | Dyrkingarveg Vestur í Dal | 1990 | 50.000 | 166.853 |
| Gøtu | Gongubrúgv um Stórugjógv | 1982 | 50.000 | |
| | Dyrkingarveg við Gøtugjógv | 1983 | 100.000 | |
| | Veg fram við iðnaðarøki í Norðagøtud. | 1987 | 150.000 | |
| | Bilst.pl. við Gøtugj. í s.v. studentask. | 1990 | 100.000 | |
| | | | **at flyta** | 2.929.684 |

| | | | flutt | 2.929.684 |
|---|---|---|---|---|
| | Íbindingarveg í landsveg úr Syðrugøtu | 1991 | 75.000 | |
| | Veg framvið iðnaðarøkinum í Gøtud. | 1991 | 75.000 | 550.000 |
| Runavíkar | Veg oman á Kópasker | 1983 | 100.000 | |
| | Veg oman á Kópasker | 1986 | 100.000 | |
| | Dyrkingarveg Yðstagerði í Lamba | 1991 | 50.000 | |
| | Vegin til kirkjugarðin í Rituvík | 1991 | 50.000 | |
| | Veg í Glyvradali | 1991 | 50.000 | 350.000 |
| Nes | Vegin niðan á Svangaskarð | 1991 | 150.000 | 150.000 |
| Skála | Veg Úti á Fløtum | 1989 | 100.000 | |
| | Veg í Skálafirði | 1989 | 50.000 | |
| | Búsetingarveg Úti á Fløtum | 1990 | 75.000 | |
| | Búsetingarv. frá Petur Poulsen og inneft. | 1990 | 75.000 | |
| | Búsetingarv. frá Ó. Petersen og suðureft. | 1991 | 150.000 | 450.000 |
| Sjóvar | Útstykkingarveg í Ovaru Follend | 1982 | 50.000 | |
| | Vegagerð til vinnuøki á Lághálsum | 1987 | 100.000 | |
| | Vegagerð til Ovara Follend | 1987 | 100.000 | |
| | Útstykkingarveg Innan Glyvur | 1988 | 100.000 | |
| | Veg niðan í Ovara Follend | 1988 | 75.000 | |
| | Útstykkingarveg Innan Glyvur | 1989 | 75.000 | |
| | Veg niðan í Ovaru Follend | 1990 | 75.000 | |
| | Uppdyrkingarveg í Morskranesi | 1991 | 50.000 | |
| | Útstykkingarveg úti á Hálsi á Strondum | 1991 | 100.000 | 725.000 |
| Sunda | Veg norður um Stóra, Oyri | 1988 | 75.000 | 150.000 |
| | Útstykkingarveg á Oyri | 1990 | 75.000 | |
| Eiðis | Bústaðarvegir á Eiði | 1987 | 100.000 | |
| | Bústaðarveg í Svínáum | 1987 | 100.000 | |
| | Dyrkingarveg við Ljósá | 1987 | 50.000 | |
| | Veg til laksaringarnar norðanv. Svínáir | 1987 | 100.000 | |
| | Veg til í Sveitask. norðanv. Svínáir | 1988 | 150.000 | |
| | Veg til í Sveitask. norðanv. Svínáir | 1990 | 150.000 | 650.000 |
| Gjáar | Veg úr landsvegnum eystur á Fløtur | 1981 | 23.845 | |
| | Dyrkingarveg í bygdini | 1982 | 75.000 | |
| | Veg eystur á Fløtur | 1984 | 100.000 | |
| | Vegbrúgv við Hulduheyggin | 1986 | 125.107 | |
| | Vegbr. við Hulduheyggin við tilh. vegi | 1987 | 100.000 | |
| | Brúgv um hulduheyggj | 1988 | 100.000 | |
| | | | **at flyta** | 5.954.684 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | | | **flutt** | 5.954.684 |
| | Vegagerð í bygdini | 1990 | 50.000 | |
| | Útstykkingarveg í bygdini | 1991 | 100.000 | |
| | Vegabrúgv um Hulduh. og vegag. | 1991 | 50.000 | 723.952 |
| Haldarsvíkar | Nýgerð av bygdarvegi í Tjørnuvík | 1990 | 9.249 | |
| | Veg eftir Bakkanum, Tjørnuvík | 1991 | 75.000 | |
| | Bygdaveg í Haldórsvík | 1991 | 75.000 | 159.249 |
| Saksunar | Veg til Kirkjugarðin | 1978 | 100.000 | |
| | Ábøt. á Gamlav. og brúnna um Skipá | 1979 | 80.000 | |
| | Dyrk. veg út við v.s. av Pollinum | 1982 | 75.000 | 255.000 |
| Ilvalvíkar | Veg til Leguhúsið í Nesvík | 1988 | 100.000 | |
| | Ískoytisstudning til vegin í Nesvík | 1989 | 150.000 | |
| | Ískoytisstudning til vegin í Nesvík | 1990 | 150.000 | |
| | Veg til Leguhúsið í Nesvík | 1991 | 75.000 | |
| | Uppdyrkingarv. í Streymnesi | 1991 | 75.000 | 550.000 |
| Hósvíkar | Kloakk | 1989 | 50.000 | |
| | Kloakk | 1990 | 75.000 | 125.000 |
| Kollafjarðar | Útstykkingarveg á Todnesi | 1985 | 100.000 | |
| | Veg í Líðini, Sundunum og á Todnesi | 1986 | 150.000 | |
| | Útstykkingarveg t. bústaðarøki á Lygn. | 1989 | 150.000 | |
| | Vegag. í samb. við húsabygging | 1991 | 150.000 | 550.000 |
| Kvívíkar | Veg út til Stallagjógv | 1977 | 120.000 | |
| | Veg til Stallagjógv | 1985 | 100.000 | |
| | Veg út á Stallagjógv | 1986 | 100.000 | |
| | Útstykkingarveg vestan fyri Kvívík | 1988 | 75.000 | |
| | Ovara veg í Leynum | 1991 | 75.000 | |
| | Vegur Steinagerði - Úlvsá | 1991 | 75.000 | 545.000 |
*løgtingsmáli nr. 203/1992: (Eykatingseta): Broyting í løgtingslóg um rentuskatt.*

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 19. mai 1993 og eftir 1. viðgerð 19. mai 1993 beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi saman við Guðrið Joensen og Torbjørn Mikkelsen frá Toll- og Skattstovu Føroya og Kára Petersen, fíggjarstjóra í landsstýrinum.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jacob Lindenskov, Heini O. Heinesen og Lasse Klein) mælir til at samtykkja uppskotið, sum eftir landsstýrisins ætlan er neyðugt fyri at fáa til vega eisini ta rentu, sum tilskrivað verður privatum innskjótarum í tíðarskeiðnum 1. januar - 30. juni 1993. Ein meirinntøka uppá 34 mió. kr.

Undir 1. viðgerð varð gjørt vart við, at broytingarlógin kom at taka grundarlagið undan indexlánum frá Skibskreditfonden, sonevnda Helsingørmodellið. Til hetta er at viðmerkja, at í sambandi við broyting av rentuskattalógini fyri skattskyldug feløg er hædd tikin fyri hesum viðurskiftum, vísandi á løgtingslóg nr. 191 frá 28. desember 1992.

Meirilutin mælir somuleiðis til at broyta § 1 í uppskoti landsstýrisins, og setir fram soljóðandi:

## Broytingaruppskot

## til

## uppskot landsstýrisins

§ 1 verður orðað soleiðis:

"Í løgtingslóg nr. 87 frá 5. juni 1992 um rentuskatt, sum broytt við løgtingslóg nr. 99 frá 18. mai 1993, verður § 2, stk. 3 í broytingarlógini orðað soleiðis:

§ 1 formuleres således:

"I lagtingslov nr. 87 af 5. juni 1992 om renteskat, som ændret ved lagtingslov nr. 99 af 18. maj 1993 affattes § 2, stk. 3 i ændringsloven således:

"Stk. 3. Broyting nr. 4 verður galdandi fyri rentu vunnin frá 1. januar 1993 at rokna, og sum verður tilskrivað konti hjá skattskyldugum eftir hesi lóg frá og við 19. mai 1993."."

"Stk. 3. Ændring nr. 4 får gyldighed for renter optjent fra 1. januar 1993 at regne og som tilskrives konti tilhørende skattepligtige i henhold til denne lov fra og med 19. mai 1993."

Ein minniluti (Svend Aage Ellefsen) vísir á viðmerkingarnar frá samdari skattanevnd, tá broytingin í løgtingslóg um rentuskatt var til viðgerðar í vanligu tingsetuni (løgtingsmáli nr. 65/1992).

Serstakliga verður víst á, at samda nevndin metti hetta at seta lógina í gildi afturvirkandi frá 1. januar 1992, sum vánaligan lóggávusið.

Tað er hugstoytt, at løgtingið verður innkallað til eykatingsetu bert við endamálinum at samtykkja lógaruppskot sum samd skattanevnd heldur samsvara vánaligum lóggávusiði, og sum nevniliga er at lóggeva afturvirkandi.

Minnilutin vísir á, at slík mannagongd helst er ólóglig ognartøka og tí í mótstrið við hin grundlógartryggjaða ognarrættin.

Minnilutin vísir annars á, at ein rentuskattur uppá heili 22% fer at darva eini annars komandi rentulækking, sum bæði vinnulív og einstaklingar hava so nógv fyri neyðini.

Hækkaði rentuskatturin fer harafturat at skunda undir kapitalflutning úr føroyska samfelagnum og drepa allan hug hjá útlendingum at gera íløgur í Føroyum.

Hægri rentuskattur hækkar kostnaðarstøðið og fer sostatt at bremsa eini ígongdsetan og menningn av føroyskum framleiðsluvirksemi og fer haraftrat at gera eina sanering av sethúsa- og íbúðarskuldini at kalla ógjørliga. Hægri renta fer í mongum førum at vera steinurin, ið ger at setahúsaeigarin ikki longur verður mentur at bera skuldarbyrðuna.

Eyðsýnt er jú, at hækkaði renturskatturin merkir stóra nýútreiðslu hjá sparikössum umframt hjá tryggingarfelagnum.

Orsakað av tíðartrýstinum, - (Málið er framlagt umleið kr. 10.15, 1. viðgerð byrjar kl. 11.00 og álitið frá skattanevndin skal leggjast fram kr. 14.15) - hevur minnlutin ikki stundir at kanna hvørja uegativa ávirkan ein hægri útlánsrenta fær á skuldarbyrðu landskassans, og millum annað á landskassans inntøkumiss orsakað av hægri rentufrádrátti í skattauppgerðini hjá skattgjaldarunum, men at hetta snýr seg um munandi upphæddir, er eingini ivi.

Minnilutin tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins og setir einki uppskot fram.

Ein annar minniluti (Terje Davidsen) hevur hesar viðmerkingar:

Í álitinum til hetta sama mál fyri í hesari tingsetuni hevði umboð Sambandsfloksins hesar viðmerkingar:

Tá undanfarna samgonga millum Javnaðarflokkin og Fólkaflokkin hækkaði rentuskattin úr 7% til 9%, mótmælti Sambandsflokkurin harðliga. Flokkurin vísti á, at fór rentuskatturin á glið, so var stórur vandi fyri, at føroyskir politikarar ikki fingu afturhald.

Tíverri var hesin spádómur rættur. Longu við árslok 1992 samdust Javnaðar- og Fólkaflokkurin um at hækka rentuskattin til 18% fyri persónligar skattgjaldarar og 22% fyri feløg. Lógaruppskotið varð lagt fram tann 17. desember, og tað hevur síðani verið til viðgerðar í skattanevndini.

Nýggja samgongan millum Javnaðar- og Tjóðveldis- og Sjálvstýrisflokkin hevur nú avgjørt at hækka rentuskattin enn meira, soleiðis at rentuskatturin fyri privatpersónar eisini verður 22%.

Fólk kunnu vera ósamd um rentuskattaskipanin hevur verið rættvís ella ei. Men eingin, uttan mun til hugsjónarliga sannføring, sleppur undan tí veruleika, at rentuskattaskipanin hevur verið við til at tryggja innskotið í føroysku bankunum og sostatt eisini bøtt um gjaldføri landsins.

Búskaparkreppan hevur gjørt sítt til, at føroyingar hava flutt hundraðtals milliónir av landinum. Peningur, sum fyrr kundi lænast út til føroyskar skattaborgarar og vinnulív, stendur nú bundin í útlendskum virðisbrøvum í staðin.

Men hóttanin um hægri rentuskatt hevur eisini fingið einstaklingar og virkir at flyta pening av landinum. Einki er at ivast í, at enn fleiri fara at taka táttin upp, nú nýggja samgongan longu hevur avgjørt at hækka rentuskattin enn einaferð.

Eitt samfelag, sum vantar gjaldføri, eigur at stimbra hugin hjá ognarfólki at flyta pening inn í landið. Men hetta landsstýrið eins og tað undanfarna, ger tað øvugta. Hetta er sera stuttskygdur politikkur, og tað verður tann føroyski skattaborgarin, sum í síðsta enda verður fyri vanbýti.

Samgongutingfólk áttu at vita, at hægri rentuskattur hevur hægri rentustøði við sær. Hetta fer at tyngja um hjá vinnulívinum, og sethúsaeigarar, sum frammanundan eru í truplari støðu, verða eisini fyri bakkasti.

Hóast rentustøðið í Europa er lækkandi og helst fer at lækka enn meira, um danir siga ja til Edinburgh avtaluna um eina viku, fara føroyingar ikki at fáa somu rentulækking sum aðrir orsakað av hækkaða rentuskattinum.

Minnilutin (Terje Davidsen) tekur ikki undir við at hækka rentuskattin og mælir tinginum til at fella uppskot landsstýrisins.

Hetta nú framlagda broytingaruppskot vil haraftrat føra við sær, at borgaramir verða ikki eins skattaðir í og við, at teir borgarar, sum ikki hava fingið mánaðarliga rentutilskriving eða ikki hava uppgjørt síni konti verða skattaðir við aftirvirkandi kraft frá 1. januar 1993, meðan onnur verða fritikin fyri at gjalda í hesum sama tíðarskeiði.

Støða Sambandsfloksins í hesum máli er óbroytt frá 10. mai 1993 og tekur tí ikki undir við uppskotinum.

**Ískoytis**

**Upskot**

**til**

Løgtingsmál nr. 203/1992 (Eykatingseta): Broyting í løgtingslóg um rentuskatt.

**§ 2.**

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

# 204. Lántøka til landskassan

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um lántøku til landskassan.*

*lagtingslov om låntagning til landskassen.*

**§ 1.**

Landsstýrinum verður landskassans vegna heimilað at læna 1.000.000.000 kr.

**§ 1.**

Landsstyret bemyndiges til landskassens vegne at låne 1.000.000.000 kr.

**§ 2.**

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

**Viðmerkingar:**

Í avtaluni frá 28. mai 1993 millum Ríkisstjórn Danmarkar og Føroya Landsstýri gav danska ríkisstjórnin tilsøgn um at søkja játtandi myndugleikarnar um loyvi at veita landskassanum fyribils ríkislán innan fyri ein karm uppá eina milliard krónur.

Lánið er ætlað at fíggja rakstrarhall landskassans, møguligt gjaldføri - ella kapitalinnskot til bankar, og tiltaksgjaldføri landskassans.

Fyribils lánið verður rentað við 8 prosentum p.a. Lánið verður seinni í ár lagt um til at vera eitt 6 ára standandi lán. Rentan verður ásett eftir marknaðarrentuni fyri ríkislánsbrøv, t.v.s. tað sum meðalrentan fyri ríkislánsbrøvini er í 20 teir

seinastu dagarnar, áðrenn lánið verður trekt. Henda renta er í løtuni umleið 7 prosent p.a.

## Felagsálit

### í

*løgtingsmáli nr. 204/1992: (Eykating): Lántøka til landskassan.*
*løgtingsmáli nr. 207/1992 (Eykating): Rammuavtala frá 28. mai 1993 um endurfígging av skuld landskassans o.a.*

Málini eru løgd fram av landsstýrinum tann 9. juni 1993 og eftir 1. viðgerð 11. juni 1993 beind í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málini og undir viðgerðini hevur fíggjarnevndin havt fund við Maritu Petersen, løgmann og Finnboga Ísakson, landsstýrismann í fíggjar- og búskaparmálum.

Á fundinum við løgmann og landsstýrismannin varð rammuavtalan frá 28. mai 1993 um endurfígging av skuld landskassans o.a. nágreiniliga umrødd og serstakliga varð punkt 3 í nevndu avtalu umrøtt. Víst varð á, at orðingin í nevnda punkti er óheppin, og eigur landsstýrið møguliga at gera eina roynd mótvegis donsku stjórnini fyri at fáa orðalagið í punkt 3 broytt.

Spurningurin, um rentur og avdráttir av ríkiskassalánunum kunnu mótroknast í blokkstuðlinum, varð eisini umrøddur.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og tríggjar minnilutar.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Heini Johansen, Hergeir Nielsen og Asbjørn Joensen) er av teirri áskoðan, at landsstýrið eigur at royna at broyta orðingina í punkt 3 í rammuavtaluni frá 28. mai 1993 um endurfígging av skuld landskassans o.a.

Viðvíkjandi spurninginum mótrokning í blokkstuðlinum, vísir meirilutin á, at fyri framtíðina verða samráðingar um blokkin eina ferð um árið. Út frá hesum heldur meirilutin, at tað ber ikki til at fáa nakra bindandi trygd fleiri ár fram í tíðina.

Viðvíkjandi punkt 5 har sagt verður, at landsstýrið um neyðugt, skal útvega teimum báðum stóru bankunum neyðugan pening fyri at lúka treytirnar í bankalóggávuni, heldur meirilutin, at hetta ikki eigur at verða gjørt, uttan at treytir, sum skulu góðkennast av løgtingsins fíggjarnevnd, verða lagdar við og góðkennast.

Meirilutin mælir annars til at samtykkja uppskot landsstýrisins nr. 204: Lántøka til landskassan og 207: Rammuavtala frá 28. mai 1993 um endurfígging av skuld landskassans o.a.

Ein minniluti (Anfinn Kallsberg) hevur hesar viðmerkingar.

Avtalan frá 28. mai 1993 millum Føroya landsstýri og donsku stjórnina umfatar hesa "hjálp" frá donsku stjórnini til Føroya:

a) Landskassalán verða, so hvørt tey falla til gjaldingar, endurfíggjað av danska statinum og ikki av gomlu lángevarunum ella vanliga lánsmarknaðinum, Føroyar hvørva sostatt av alheims lánsmarknaðinum.
Lánini koma at standa í 6 ár og árliga aftan á 1994 verður samráðst um afturgjaldingina í sambandi við føroysku fíggjarlógina og áseta av blokkstuðuli. Rentan verður marknaðarrentan fyri donsk ríkislánsbrøv.

b) Danski staturin veitir landskassanum eitt lán upp á maximum 1 mia. kr. Lánið er ætlað til likviditetstørv landskassans fram til oktober 1993 og til at hava sum tiltak 5-600 mió kr. til møguliga hjálp til teir báðar størru føroysku bankarnar. Lánið kann seinri - tað vil siga aftaná komandi árslok - umleggjast til sama slag lán, sum nevnd undir a.

*Treytirnar fyri lánveitingini frá ríkinum eru:*

a) Landskassin sleppur ikki at taka lán ella veita veðhald uttan samtykki frá donsku stjórnini, so leingi endurfíggingarlánini frá statinum ikki eru fult afturgoldin .

b) Blokkstuðulin til Føroya skal ásetast á hvørjum ári aftan á 1994.

c) Løgtingsfíggjarlógin skal á hvørjum ári ásetast í samráð við donsku stjórnina.

d) Landsstyrið váttar, at tað vil reka ein "stabilitetsorienteret" fíggjarpolitikk.

e) Í samband við endurfíggingina hevur danska stjórnin fingið at vita, at landsstýrið framhaldandi stuðlar endurskipanina av fiskiídnaðinum, sum Fíggingargrunnurin frá 1992 er í ferð við at avrika. At fiskivinnan skal minkast til tað, sum lívfrøðiliga og búskaparliga kann klárast, og at fiskiveiðan skal regulerast eftir teirri tilráðing, sum bygnaðarnevndin kemur við áðrenn 1. juli 1993.

f) Samráðingar skulu verða aftur í september 1993 fyri at vita, um fyritreytirnar fyri endurfíggingini eru í lagi. Hesar fyritreytir er m.a. fiskivinnubygnaðurin og løgtingsfíggjarlógin.

Treytir, sum eru burturdotnar, eru m.a. krav∂ um javnvág á fíggjarlógini 1993, krav∂ um betran uppá 65 mió. kr. og ymiskar av teim avtalum, ið gjørdar vórðu undir IMF vitjanini.

Fólkaflokkurin harmast, at stjórnin og landsstýrið hava avtalað, at higartil førdi fíggjarpolitikkurin verður linkaður, og longu hava kunngjørt, at núverandi kreditorar landskassans fáa goldið sínj lánsgjøld frá statinum. Minnilutin óttast fyri

fylgjunum av aftur at loyva hækkandi almennum útreiðslum. Hetta verður fylgjan, hóast ein partur av bráðkomna hallinum er nýkomin effektiv veðhald.

Flokkurin kann ikki taka undir við nógvum av orðingunum í avtaluni og vil tí skjóta upp, at broytingarnar verða samtyktar av løgtinginum, og at landsstýrið tekur upp samráðingar beinanvegin við stjórnina um at fáa hesar við í avtaluna.

Fyrst og fremst kann minnilutin ikki taka undir við punkt 3 í avtaluni, har landsstýrið bindur seg til at góðtaka tann fiskiídnaðarbygnað, sum Fíggingargrunnurin frá 1992 kemur til.

Sambært hesi ætlan verður føroyski fiskiídnaðurin monopoliseraður í eitt framleiðslufelag, sum fíggingargrunnurin frá 1992, og báðir størru bankarnir stýra. Trupult verður at halda virksemið gangandi í mótstøðu og í kapping við monopolfelagið. Fólkaflokkurin óttast, at monopoliseringin av fiskiídnaðinum bert er fyrsta stigið.

Næsta sjónliga úrslitið av hesum ætlanum verður, at einans tey fiskiskipini, sum fíggingargrunnurin og bankarnir meta týdningarmikil fyri monopolfelagið verða saneraði fíggjarliga og hildin í rakstri frameftir. Scinni fylgir alivinnan og annað fyritaksvirksemi við í monopolætlanirnar. Møguleikin hjá føroyskum feløgum, einstaklingum og myndugleikum at ávirka vinnulívsbygnaðin her á landi, verður sostatt bert eitt eiti.

Stutt kann sigast, at landsstýrið og løgtingið við góðtøku av fyriliggjandi uppskoti geva bankunum ein blancokekk og harvið seta seg sjálvan uttanfyri.

Til tess at fyribyrgja hesi gongd, setir fólkaflokkurin fram soljóðandi lógaruppskot, og mælir løgtinginum til at samtykkja tað.

## Uppskot

## til

*løgtingslóg um verju móti monopolstøðu innan fiskiveiði og -ídnað.*

*lagtingslov om foranstaltninger imod monopolstatus i fiskerierhverv og -industri.*

**§ 1.**

Ikki er loyvt einum eigara (felag ella persóni ella bólki av feløgum og/ ella av persónum) at eiga meir enn 20% av fiskiídnaðinum á landi í Føroyum ella av feskfiskaflotanum, sum hevur veiðiloyvi til at fiska undir Føroyum.

**§ 1.**

Det er ikke tilladt for en ejer (selskab eller person eller gruppe af selskaber og/eller personer) at være ejer af mere end 20% af fiskeindustrien på land på Færøerne eller af ferskfiskeflåden, der har fangsttilladelse til at fiske ved Færøerne.

| | |
|---|---|
| **§ 2.** | **§ 2.** |
| Við fiskiídnað á landi í Føroyum skal skiljast allar tær fyritøkur, sum virka fiskasløgini undir Føroyum. | Fiskeindustri på land på Færøerne betyder alle de virksomheder, der bearbejder fiskesorter, der er fanget ved Færøerne. |
| **§ 3.** | **§ 3.** |
| Við feskfiskaflota er at skilja tey før, sum hava veiðiloyvi til at fiska undir Føroyum. | Ferskfiskeflåde betyder de fartøjer, der har fangsttilladelse til at fiske ved Færøerne. |
| **§ 4.** | **§ 4.** |
| Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. | Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er kundgjort. |

Harnæst eigur orðingin viðvíkjandi komandi fíggjarlógum og blokkstuðulsskipan at virða heimastýrið meira, enn tann núverandi ger.

Eisini er minnilutin í iva um, hvussu nýtslan av tí nýtilførda peninginum upp á 1 mia. kr. skal býtast millum landskassan (likviditet, hall m.a.) og tiltak til møguliga hjálp til bankarnar. Her eigur orðingin at vera greiðari.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg) setir út frá hesum:

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrinum at broyta orðingar í "rammuavtalu frá 28. mai 1993 um endurfígging av skuld landskassan o.a."

1. Orðini í punkt 3: "at landsstyret fortsat støtter den omstrukturering af fiskeindustrien, som finansieringsfonden af 1992 er i gang med ...." ganga út.
2. Í punktunum 4 og 7 verða orðingarnar um blokkstuðul og fíggjarlógarviðurskifti broyttar soleiðis:

   a) at blokkurin verður ásettur til fasta uppnædd at endurskoða 3. hvørt ár og
   b) at ríkisstjórnin og landsstýrið ásanna, at føroyska fíggjarlógin er føroyskt sermál og sostatt ikki skal hava politiska viðgerð aðrastaðni enn í Føroyum.

3. Í punktunum 1, 5 og 6 er umrøtt møgulig hjálp til bankarnar. Orðingarnar eiga at verða greiðar soleiðis, at ávís upphædd. 500 mió. kr., er avsett til hetta

endamál, og bert kann brúkast til tað aftaná, at málið aftur er lagt fyri løgtingið. Samstundis er upphæddin til sjálvan landskassan avmarkað til 500 mió. kr.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg) skjýtur eisini upp, at um neyðugt og um biðið verður um tað, kann atkvøðast um hvørt punktið sær bæði í hesum uppskotinum til samtyktar og í rammuavtaluni.

Minnilutin vísir á, at ætlaða umskipanin av landskassaskuldini einans merkir nýggja og størri lántøku, og minnlutin ásannar, at landsstýrið higartil onga leið hevur víst á, hvussu skuldarbyrða landskassans verður aftur - ella niðurgoldin.

Framhaldandi lántøka kemur landskassanum og harvið øllum tí føroyska samfelagnum í óføri, og í tí sambandinum heitir minnilutin á landsstýrið at taka upp tær ætlanir, Fólkaflokkurin legði fram í løgtingsmáli nr. 192/1992: Setan av nevnd til at koma við uppskotum um, hvussu búskapurin í landinum kann byggjast uppaftur.

Ein annar minniluti (Flemming Mikkelsen) hevur hesar viðmerkingar til løgtingsmálini 207 og 204:

Rammuavtalan millum donsku stjórnina og Føroya landsstýri er ein staðfesting av, hvussu út av lagi okkara búskaparligu viðurskifti í veruleikanum eru.

Avtalan er vissuliga ein staðfesting av, hvønn lívsneyðugan týdning ríkisfelagsskapurin hevur fyri føroyska samfelagið.

Sambandsflokkurin undantikin, so er tað eitt faktum, at allir politiskir flokkar, bæði innan og uttan tinggátt hava sum aðalmál at loysa okkum úr ríkisfelagsskapinum.

Henda avtala inniber týðiliga eina konstatering av, at nú ásanna flest allir flokkar á løgtingi, um enn við ringum tannabiti, hvønn týdning felagsskapurin hevur fyri okkara viðbrekna samfelag, og hóast settir undir umsiting, fáa vit kortini loyvi at látast, sum um einki var hent.

Okkara kreditvirði er niðanfyri minstu krøv og tí púrt einki vert.

Ikki ein króna hevði fingist til láns á heimsmarknaðinum, sum støðan er.

Um fáar dagar hevði sambært løgmann landskassin farið á húsagang, og honum á baki høvdu Føroya Banki og Sjóvinnubankin farið "nedenom og hjem".

Ikki er tørført at gita, hvat síðan hevði hent. Heilsuverkið, skúlaverkið, almannaverkið, umsitingin, snøgt sagt alt samfelagið hevði steðgað upp, og ruðuleikin hevði verð fullkomin.

Sambandsflokkurin hevur tíverri verið settur uttanfyri politiska ávirkan seinastu nógvu árini, og hevur tí ikki havt møguleika at gera sína ávirkan á ta avtalu, sum fyriliggur. Sambandsflokkurin ásannar tó, at okkara búskaparligu viðurskifti eru so háttað, at hjálp uttanifrá, er bráneyðug. Eitt er tó givið, fær Sambandsflokkurin neyðuga politiska undirtøku eftir eitt komandi løgtingsval, verða okkara viðurskifti við ríkisstjórnina tikin upp til nýggja viðgerð.

Minnilutin (Flemming Mikkelsen) vísir á ótryggleikan, pkt. 3 í avtaluni inniber, og kann tí ikki góðtaka, at øll fiskavirkini verða løgd í eitt móðurfelag, sum tíðindi vilja vera við. Eisini er komið fram, at meiri enn helmingurin av virkjunum skulu steingjast, og sostatt á ongan hátt loysir teir arbeiðsloysistrupulleikar, vit hava at dragast við.

Sambandsflokkurin hevur fyri langari tíð síðan gjørt vart við, at hesir trupulleikar fóru at taka seg upp.

Sambandsflokkurin fekk tað stutta tíðarskeið, hann var í samgongu áðrenn síðsta val, samtykt lógina um ráfiskabýtið, fyri á tann hátt, at flest øll flakavirkir kundu fáa eina ávísa nøgd av ráfiski og harvið eitt ávíst virksemi.

Tað fyrsta Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin gjørdu eftir valið var at avtaka lógina um ráfiskabýtið.

Nú gongur Javnaðarflokkurin á odda saman við Tjóðveldis- og Sjálvstýrisflokkinum inn fyri at niðurleggja størru helvtina av flakavirkjunum, og kemur harvið mangari bygd og kommunu út í enn størri armóð og vónloysi, tá tað altavgerandi arbeiðsplássið á staðnum ikki longur skal hava loyvi at virka.

Eisini hevur sambandsflokkurin víst á, at vit eiga at taka upp samráðingar við EF um treytimar fyri limaskapi, og harvið møguleikan á jøvnum føti at virka og handla innkeypta rávøru og soleiðis økja um virksemi víða hvar í landinum.

Út frá ornanfyri framførda, har ein m.a. ikki kennir innihaldið í eini fyri samfelagið so avgerandi ætlan, sum punkt 3 í avtaluni, setir minnilutin (Flemming Mikkelsen) fram soljóðandi:

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið samtykkir, at punkt 3 í rammuavtaluni frá 28. mai 1993 verður strikað.

Víst verður eisini á, at nú allur ríkisstuðulin verður lagdur í blokk og árliga ásettur við lóg, fæst eingin trygd fyri, um hesin verður mótroknaður í rentum og avdráttum av ríkislánum.

Minnilutin (Flemming Mikkelsen) ásannar, at okkara búskaparligu viðurskifti eru so háttað, at peningalig hjálp uttanífrá er bráneyðug, og tekur tí undir við løgtingsmáli nr. 204: Lántøka til landskassan.

Hin triði minnilutin (Tordur J. Niclasen) førir fram:

Í viðmerkingunum til uppskotið (207/1992) verður m.a. sagt, at ein orsøk til, at landskassaroknskapurin fyri 1993 fer at vísa stórt hall er, at "minkandi virksemi og minkandi keypiorka førir við sær, at inntøkur landskassans eru munandi minni enn ætlað."

At landsstýrið kemur við hesi grundgeving nú, tykist løgið, tá hugsað verður um, at politikkur hjá undanfarnu samgongu millum Fólkaflokkin og Javnaðarflokkin júst hevði til endamáls at minka keypiorkuna og at minka virksemið í landinum.

Politikkurin hjá sitandi samgongu millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldisflokkin og Sjálvstýrisflokkin ber á sama borðið, og eru tiltøkini (mvg-hækkan, rentuskattahækking v.m.) fult prógv um, at hildið verður fram á somu kós sum undanfarna samgonga, har ein byrða fyri onnur eftir verður løgd á herðar skattgjaldarans við teim avleiðingum, at minni og minni kemur inn í landskassan.

So í roynd og veru er her talan um eina ásannan av, at førdi politikkur við hægri skatti, hægri avgjøldum, íløgusteðgi v.m. hevur ført okkum út á eina óhepna rás við svárum samfelagsligum og menniskjaligum avleiðingum.

Enn einaferð verður so eisini sagt, at "ein serligur trupulleiki er, at føroysku bankarnir eru so illa fyri, at teir ikki tola munandi tap, uttan at eginpeningurin fer niður um lógarkravda lágmarkið, og at vandi sostatt er fyri sjálvum føroyska peningakervinum...."

Hesi sjónarmið hava áður ljóðað frá politiskari síðu, og hava verið beinleiðis orsøk til, at føroyski skattgjaldarin í tíðarskeiðnum frá 6. oktober 1992 til 1. februar 1993 varð skuldarbundin við ikki færri enn 850 mió. kr.

Tá hugsað verður um, hvat fram er farið síðan avtaluni frá oktober 1992, má sigast, at landsstýrið (Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin) postuleraðu, tá hesir, eftir at avtalan varð gjørd, endurtóku, at neyðugt var við nevndu innspræning til Sjóvinnubankan til tess at bjarga "føroyska peningaheiminum og samfelagnum sum heild", sum tikið varð til.

Tá hugsað verður um, at føroyski skattgjaldarin og andstøðan á tingi aftur og aftur fekk at vita, bæði frá landsstýrinum og bankafólki, at "nú var føroyski peningaheimurin sterkari og tryggari enn nakrantíð", so má av røttum sigast, at lítið hald var í hesum orðum!

Bert 4 mánaðir seinni endurtók søgan seg!

Skattgjaldarin varð tikin við nøsini, uttan at politiski myndugleikin á nakran hátt tryggjaði sær, hvussu hesar 850 mió. kr. fóru at verða nýttar, og hvørjum tær í roynd og veru fóru at koma til góða.

Enn stendur hin skuldarbundni skattgjaldarin undrandi og spyr:

- "Hvat hevði í veruleikanum hent, um peningurin ikki varð játtaður Sjóvinnubankanum?"
- "Hvar eru tær 850 mió. kr. farnar?"
- "Hvør er í veruleikanum hjálptur?"

Minnilutin (Tordur J. Nielasen) hevur áður í uppskoti á tingi roynt at fingið meiriluta fyri at áleggja landsstýrinum at kanna hesar spurningar - tó uttan úrslit.

Løgið tykist tað, at skattgjaldarin, hvørs peningur varð bruktur at "hjarga" einum banka við, als ikki skal hava møguleika fyri at fáa innlit í, hvussu peningurin varð nýttur!!

Heilt burturvið er tað, at enntá løgting og landsstýri heldur ikki tykjast at fáa upplýsingar um, hvussu nevndu milliónir eru brúktar!

Her kann ein tí av røttum spyrja: "Eru bankarnir til fyri fólksins skuld, ella er fólkið til fyri bankanna skuld?" Ella sagt á ein annan hátt: Skulu vit hava eina bankaskipan, har primera uppgáva bankanna er at vinna pening, ella skulu vit hava eina bankaskipan, har primera uppgáva bankanna er at menna samfelagið?

Sambært rammuavtaluni frá 28. mai 1993 er hædd tikin fyri, at einar 600 mió. kr. skulu nýtast sum stuðul til teir stóru bankarnar.

Uttan at landsstýrið beinleiðis skal føra bankavirksemi, so má tó minsta mark verða, at tann peningur, sum landsstýrið upp á nakkan á føroyska skattgjaldaranum slúsar til bankarnar, kemur einstaklinginum og samfelagnum sum heild aftur til góða. Hvussu hesin skattgjaldarans peningur verður nýttur, eigur ikki at verða nakað dulsmál!

Tí eigur landsstýrið/fíggjarnevndin at tryggja sær javnan at fáa upplýst um fíggjarstøðu bankanna og hvønn politikk, bankarnir ætla at føra við skattgjaldarans peningi.

Samsvarandi hesum verður skotið upp soljóðandi:

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landstýrinum sum skjótast at taka upp samráðingar við nevndu bankar við tí endamáli:

1) Greidliga at fáa at vita hvønn politikk, bankarnir ætla at føra.
2) At landsstýrið /fíggjarnevnd javnan verða kunnaði um likviditet bankanna.

Spurningar, ið reisa seg í hesum sambandi, eru t.d. í hvønn mun henda avtala kemur.

- at hjálpa upp á støðuna í vinnulívinum, soleiðis, at framleiðslufortreytirnar gerast betri, og kappingarførið mennist -at hjálpa upp á tað alsamt vaksandi arbeiðsloysið
- at hjálpa upp á støðuna hjá kommununum
- at hjálpa upp á støðuna hjá teimum mongu húsaeigarunum kring landið
- at hjálpa upp á arbeiðsloysisskipanina, sum til heystar helst dettur sundur.

Hvat avtaluni millum stjórnina og landsstýrið annars viðvíkur, so eru ikki so fáar treytir lagdar við. Nakrar av hesum eru framhald av teimum treytum, sum vóru frá 1. februar 1993, og aðrar eru nýggjar.

Hvat treytini í pkt 3 viðvíkur verður sagt: "Den danske regering noterer sig i forbindelse med refinansiering, at landsstyret *fortsat* støtter den omstrukturering af fiskeri industrien, som finansieringsfonden af 1992 er i gang med, og at landsstyret er indstillet på en reduktion af kapaciteten i det færøske fiskerierhverv til det biologiske og økonomiske bæredygtige, samt en regulering af fiskeriet med udgangspunkt i de anbefalninger, som inden 1. juli 1993 ventes at fremkomme af strukturudvalget."

Hetta er í veruleikanum framhald av tí, sum grundarlag var lagt fyri í avtaluni frá februar mánaða í millum stjórnina og táverandi landsstýrið millum Fólkaflokkin og Javnaðarflokkin.

Í teirri avtaluni sæst undir "Fælleserklæring fra den danske regering og det færøske landsstyre" soljóðandi: "På foranledning af finansieringsfonden af 1992 og i samarbejde med færøske pengeinstitutter og andre finansielle institutioner med interesse på Færøerne etableres der en strukturfond med det formål at bidrage til reorganisering af levedygtive virksomheder og i fornødent omfang at medvirke ved afviklingen af nødlidende erhvervsarrangementer."

Við hesum varð saneringsætlanin løgd og somuleiðis støðið undir tí sokallaða móðurfelagnum.

Henda avtala fekk ikki færri enn 20 atkvøður á tingi (samgongan, Kristiligi Fólkaflokkurin Føroya framburðs- og fiskivinnuflokkur og tvær atkvøður úr Sjálvstýrisflokkinum).

At Fólkaflokkurin so seinni vaknaði við kaldan dreym og sá, hvønn veg tað bar í sambandi við umtalaða móðurfelag, er so ein heilt onnur søga.

Hvat umtalaða móðurfelag viðvíkur, gjørdi Miðflokkurin í yvirlýsing frá apríl mánað vart við, at hann tók undir við eini sanering av vinnulívinum, men kundi undir ongum umstøðum taka undir við eini monopolisering av tí føroyska vinnulívinum. Grundaði hetta á, at slík monopolisering kom at darva, økja um arbeiðsloysið og føra við sær uppaftur fleiri sorgarleikir fyri einstaklingar og familjur kring landið.

Her eigur at verða víst á, at bæði vinnan á landi og sjógvi hava mótmælt hesi monopoliseringsætlan.

Tí ivast eisini minnilutin stórliga í metanini har landsstýrið í viðmerkingunum til avtaluna sigur, at hendan avtalan "setir ein niðara karm fyri, hvussu langt virksemið í føroyska samfelagnum kann fara".

Helst man tað vera tað sama, meirilutin í fíggjarnevndini í sínum viðmerkingum til álitið hugsar um, tá hesin sigur: "....at teirra áskoðan er, at landsstýrið eigur at royna at broyta orðingina í pkt. 3 í rammuavtaluni".

Einki at siga danir ringar fyri, at hesir hava sett treytir í sambandi við hesa rammuavtalu, tað skulu teir sum lángevarar ikki lastast fyri. Hinvegin tykist tað sum um, at føroyingar bert hava nikkað til tað, sum hevur verið lagt teimum á borðið frá danskari síðu, tí ásannast má, at hendan avtalan ger, at vit í fult mát eru sett undir umsiting og niðurbundin sum tjóð.

Hvør skuldi so trúð, at vit við Tjóðveldisflokkinum á odda soleiðis eru sett aftur í amtstíðina?

Tá hugt verður eftir treytum annars, so sæst, at enntá okkara fíggjarlóg - karmurin um hesar - skal góðkennast av donskum myndugleikum.

Fíggjarliga eru vit sostatt eisini bundin á hendur og føtur.

Ein kann her loyva sær at spyrja, í hvønn mun tungan á vágskálini hjá donsku stjórnini, føroyski javnaðarfólkatingslimurin hevur gjørt seg galdandi, og um hetta úrslitið í roynd og veru er tað, sum føroyingar, væl at merkja sitandi samgonga hevur ynskt sær?

Tá framhaldandi verður hugsað um pkt. 3 í rammuavtaluni, hvussu okkara fiskifloti kemur at síggja út, er enn heldur eingin trygd fingin fyri, hvør partur av flotanum sleppur at yvirliva, og hvussu hesin flotin kemur at síggja út, tá ið avtornar. Minnilutin (Tordur J. Niclasen) hevur áður mangan ført fram týdningin av at minka um partrolaraflotan, og í staðin menna húkaveiðuna, tá hetta m.a. førir við sær, at munandi fleiri kunnu koma í arbeiði.

Vónandi fer húkaveiðan aftur at verða prioriterað, men í hesum tíðum, har nógv verður tosað um effektivitet, kann ein stúra fyri at júst tað øvugta hendir.

Ásannast má, at fíggjarliga og búskaparliga eru vit illa fyri, og at tað tí er neyðugt við kapitaltilførslu til samfelagið, men hvat treytunum í hesi rammuavtalu viðvíkir, er tað so nógvir spurningar, sum enn eru ósvaraðir og tykjast ógreiðir.

T.d. kann eisini nevnast spurningurin um, hvat hendir við blokkstuðulinum, tá ið tær samráðingar verða tiknar fram og í hvønn mun mótroknað verður í hesum stuðuli. Orsakað hetta og tað, sum annars er ført fram, kann minnilutin (Tordur J. Niclasen) ikki taka undir við hesi rammuavtalu og er av teirri áskoðan, at nýggjar samráðingar sum skjótast eiga at fáast í lag við donsku stjórnina hesum viðvíkjandi. Samsvarandi hesum verður tí skotið upp soljóðandi:

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum sum skjótast at taka upp nýggjar samráðingar við donsku stjórnina rammuavtaluni viðvíkjandi.

Um hetta uppskotið til samtyktar ikki vinnur frama, og rammuavtalan verður óbroytt, so metir minnilutin hesa rammuavtalu at vera av so stórum prinsipiellum týdningi, og havandi so víttfevnandi ávirkan á okkara samfelag og tað fólk, ið her búleikast, at fólkið sjálvt eigur at taka støðu til spurningin. Samsvarandi hesum verður tí skotið upp soljóðandi:

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at skipa fyri fólkaatkvøðu, um rammuavtalan frá 28. mai 1993 millum donsku stjórnina og Føroya landsstýri skal setast í verk.

Hvat arbeiðnum hjá bygnaðarnevndini viðvíkur, so skal hendan koma við einum tilmæli áðrenn 1. juli 1993, t.v.s. innan góðar 14 dagar. Tí er tann støða, sum vit nú sum fiskivinnutjóð eru komin út í, sera óheppin, har komandi mikudag 16. juni ikki færri enn 21 skip eru lýst til at fara á tvingsilssølu.

Óvist verður, hvussu lagnan hjá hesum skipum verður, og hvar ið tey fara, tá ið avtornar. Ikki er óvist, at útlendingar liggja frammi við og royna at fáa fatur á teimum frægastu skipunum, vit hava. Tí átti ein slík tvingsilssøla at bíða, til ið hvussu so er tilmælið frá bygnaðarnevndin var úr hondum greitt, soleiðis at menn sóu, hvørjar fortreytir vóru til staðar til framhaldandi at røkja fiskiskap her á landi.

Best var, um hesar tvingsilssølur vórðu útsettar til eftir 1. juli, og er minnilutin (Tordur J. Niclasen) tí av teirri áskoðan, at landsstýrið eigur at gera tað, sum gerast kann fyri, at hesar tvingsilssølur verða útsettar.

Samsvarandi hesum loyvir tí minnilutin sær (Tordur J. Niclasen) at seta fram soljóðandi:

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at taka neyðug stig til, at ætlaðu tvingsilssølurnar 16. juni verða útsettar.

# 205. Endurstovnan av eginpeningi Menningargrunni Ídnaðarins

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um endurstovnan av eginpeningi Menningargrunni Ídnaðarins.*

**§ 1.**

Landsstýrinum verður landskassans vegna heimilað at veita Menningargrunni Ídnaðarins 65 mió. kr. í nýggjum eginpeningi.

**§ 2.**

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

*lagtingslov om reetablering af Industriens Udviklingsfonds kapital.*

**§ 1.**

Landsstyret bemyndiges til landskassens vegne at indskyde ny egenkapital, 65 mio. kr., i Industriens Udviklingsfond.

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

**Viðmerkingar:**

Uppskot menningargrunsins til ársroknskap fyri 1992 vísir eitt hall upp á knappar 90 mió. kr.

Burturleggingar og avskrivingar grunsins í 1992 eru 100 mió. kr. og er eginpeningur grunsins tískil komin niður á - 49 mió. kr. við ársenda 1992.

Um eginpeningur grunsins er negativur, falla lán grunsins til gjaldingar. Landskassin noyðist sum veðhaldari fyri hesum lánum at innfría lán grunsins, um ikki eginpeningurin verður endurstovnaður.

Verða Menningargrunninum veittar 65 mió. kr. í nýggjum eginpeningi, kemur eginpeningurin upp á 16 mió. kr.

Hjálagt yvirlit yvir lántøku grunsins.

## Felagsálit

## í

*løgtingsmáli nr. 205/1992: (Eykating): Endurstovnan av eginpeningi Menningargrunni Ídnaðarins,*
*løgtingsmáli nr. 206/1992 (Eykating): Eftirgeving av skuld og endurstovnan av eginpeningi Føroya Ídnaðargruns.*

Málini eru løgd fram av landsstýrinum tann 9. juni 1993 og eftir 1. viðgerð 11. juni 1993 beind í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málini.

Undir viðgerðini hevur fíggjarnevndin hildið fund við umboð fyri Føroya Ídnaðargrunn og við Menningargrunn Ídnaðarins.

Umboðini fyri grunnarnar greiddu frá støðuni hjá báðum grunnunum. Rakstrarroknskapirnir fyri 1992 vórðu umrøddir og gjøgnumgingnir.

Somuleiðis varð fíggjarstøðan pr. 31. december 1992 umrødd.

Spurningurin um at avtaka grunnarnar ella at leggja teir saman til ein grunn, sum kann røkja somu áhugamál sum í dag, verða røkt av ávikavist Føroya Ídnaðargrunni og Mennigargrunni Ídnaðarins, varð umrøddur. Í hesum sambandi varð nomið við tann møguleikan, at ein møgulig samanlegging eisini kundi fevna um grunnin fyri ídnaðarfremjandi endamál og gistingarhúsgrunnin.

Undir viðgerðini hevur fíggjarnevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Heini Johansen, Hergeir Nielsen, Asbjørn Joensen og Flemming Mikkelsen) mælir til at samtykkja uppskotini hjá landsstýrinum.

Annars mælir sami meiriluti til, at landsstýrið tekur spurningin um samanlegging av grunnunum til viðgerðar.

Ein slík viðgerð eigur sjálvandi at fara fram í samráð við grunnarnar og lángevarar teirra.

Út frá hesum setir meirilutin fram soljóðandi:

## Uppskot

## til

## samtyktar

Løgtingið heitir á landsstýrið um at taka spurningin um samanlegging av Føroya Ídnaðargrunni, Menningargrunni Ídnaðarin og møguliga grunninum til ídnaðarfremjandi endamál og gistingarhúsgrunninum til viðgerðar.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg og Tordur J. Niclasen) førir fram. Menningargrunnurin og Ídnaðargrunnurin eru komnir í fíggjarliga trongstøðu. Í hesum sambandi hevur verið frammi um at avtaka grunnarnar soleiðis, at landskassin yvirtók lánsskuldirnar hjá grunnunum og harvið afturgjaldið, tá hesi lán fullu til gjaldingar. Hetta hevði viðført, at gjaldføristørvurin hjá landskassanum hevði verið minni. Nú frættist, at henda loysn ikki er møgulig, av tí at lánigevarnir ikki vilja loyva landskassanum at yvirtaka lánini.

Undir viðgerðini hava umboð fyri grunnarnar verið á fundi í fíggjarnevndini og har mælt frá at avtaka grunnarnar, og eisini mælt frá at leggja teir saman í ein grunn, meðan spurningurin um felags fyrisiting kanska var ein møguleiki, ið átti at verið royndur. Ein slík møgulig samanlegging eigur at fara fram í samráð við grunnarnar, sum hava upparbeitt sær einastu beinleiðis kontakt frá almennari síðu til vinnuna.

Út frá teimum umstøðum, vit í dag eru í, er ongin møguleiki annað enn at samtykkja uppskot landsstýrisins.

# 206. Eftirgeving av skuld og endurstovnan av eginpeningi Føroya Ídnaðargrunsins

**Uppskot**

**til**

*løgtingslóg um eftirgeving av skuld og endurstovnan av eginpeningi Føroya Ídnaðargruns.*

*lagtingslov om eftergivelse af gæld og reetablering af Færøernes Industrifonds egenkapital.*

**§ 1.**

Restskuldin av teimum lánum, sum Føroya Ídnaðargrunnur hevur fingið úr Oljugrunninum, sambært løgtingslóg nr. 99 frá 1. oktober 1986, um serligt gjald á brenniolju v.m. við seinni broytingum, jbr. løgtingslóg nr. 33 frá 27. mars 1992 um avtøku av landskassagrunnum, verður eftirgivin.

**§ 1.**

Restgælden af de lån, som Færøernes Industrifond har fået af Oliefonden i henhold til lagtingslov nr. 99 af 1. oktober 1986, om særlig afgift på brændselsolie m.v. med senere ændringer j.fr. lagtingslov nr. 33 af 27. marts 1992 om ophævelse af landskassefonde, bliver eftergivet.

**§ 2.**

Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at seta nýggjan eginpening, 15 mió. kr. í Føroya Ídnaðargrunn.

**§ 2.**

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at indskyde ny egenkapital, 15 mio. kr. i Færøernes Industrifond.

**§ 3.**

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**§ 3.**

Denne lov træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.

**Viðmerkingar:**

Uppskot ídnaðargrunsins til ársrokuskap fyri 1992 vísir eitt hall upp á umleið 17 mió. kr. Av samlaðu útlánum grunsins upp á 183 mió. kr eru umleið 79 mió. kr. settar av móti tapi.

Eginpeningur grunsins er við ársenda 1992 komin niður á umleið - 23 mió. kr. Um eginpeningurin verður verandi negativur, falla flestu lán grunnsins til gjaldingar. Landskassin veðheldur fyri hesum lánum og skuldi sostatt innfría hesi lán, um eginpeningurin ikki verður endurstovnaður.

Um landskassin eftirgevur tær umleið 15 mió. kr., sum hann hevur til góðar, og harumframt veitir íðnaðargrunninum nýggjan eginpening upp á 15 mió. kr., so kemur eginpeningurin upp á knappar 7 mió. kr.

Hjálagt yvirlit yvir lántøku grunsins.

# 207. Rammuavtala frá 28. mai 1993 um endurfígging av skuld landskassans o.a.

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið góðkennir viðløgdu rammuavtalu frá 28. mai um endurfígging av skuld landskassan o.a.

**Viðmerkingar:**

Búskaparliga støðan í Føroyum er versnað so nógv seinastu árini, at tað gjørdist greitt, at møguleikar vóru ikki fyri at fáa fíggjað rakstrarhall landskassans og endurfíggja verandi skuld.

Fleiri orsøkir eru til, at landskassaroknskapurin í 1993 fer at vísa eitt stórt hall.

Minkandi virksemið og minkandi keypiorkan førir við sær, at inntøkur landskassans eru munandi minni enn ætlað. Harumframt eru fleiri av útreiðslum landskassans væl størri enn ætlað.

Útreiðslumar í sambandi við effektivar veðhaldsskyldur mótvegis privatum vinnufyritøkum koma í 1993 væntandi upp á 280 mió. kr. Harumframt verður neyðugt, at veita nýggjan eginpening til Mennignargrunn Íðnaðarins og Føroya Íðnaðargrunn, og somuleiðis verður eitt veðhald mótvegis IRF effektivt.

Ein serligur trupulleiki er, at føroysku bankarnir eru so illa fyri, at teir ikki tola munandi tap, uttan at eginpeningurin fer niður um lógarkravda lágmarkið, og at vandi sostatt er fyri sjálvum føroyska peningakervinum.

Føroyska samfelagið stóð tí yvir fyri fleiri vandum um somu tíð. Í fyrsta lagi hevði landskassin verið farin á húsagang, um ikki fíggingarvarð fingin til hall landskassans. Hesin trupulleiki hevði stungið seg upp longu í juni mánað, um avtalan ikki var fingin í lag.

Í øðrum lagi var vandi fyri, at bankarnir fingu trupulleikar við at uppfylla minstakravið um eginpening longu á hásumri, meðan løgting og fólkating vóru í summarfrí, og sostatt kundi tað víst seg at verið ógjørligt at finna eina loysn at bjarga føroyska peningakervinum.

Landsstýrið heldur, at tað hevði verið ábyrgdarleyst, ikki at gjørt móttiltøk longu nú.

Avtalan loysir landsstýrið frá treytini um, at fíggjarlógin skal javnviga í 1993 og gevur landsstýrinum sostatt eitt longri skotbrá at gera neyðugar tillagingar, sum kunnu verða føroyska samfelagnum at gagni upp á longri sikt.

Tann parturin av avtaluni, ið snýr seg um, at landskassin um neyðugt skal endurstovna eginpeningin hjá teimum báðum stóru bankunum, fer væntandi at endurskipa álitið á peningastovnsskipan okkara. Tann flytingin av kapitali av landinum, sum seinastu mánaðirnar í stóran mun hevur køvt búskaparliga virksemið, fer nú væntandi at steðga og spakuliga at venda til eina kapitaltilflyting.

Landsstýrið heldur, at avtalan bæði er neyðug og gagnlig fyri føroyska samfelagið. Hon loysir ikki teir trupulleikar, samfelag okkara hevur at dragast við, men hon setir ein niðara karm fyri, hvussu langt niður virksemið í føroyska samfelagnum kann fara.

Landsstýrið skal tí heita á løgtingið um at góðkenna avtaluni í verandi líki.

Rammuavtala er hjáløgd.

# Landsstyrets lån i udlandet og i Danmark

Udestående gæld pr. 31/5 1993

| Långiver | Opr. hovedst. | | Rente | Løbetid | Valuta Saldo 31/5-93 | | DKK[1] Saldo 31/5-93 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| N.V. Bank Nederland | NLG | 20.000.000 | 10 5/8% | 1980-1995 | NLG | 6.000.000 | 20.512.800 |
| Yamaichi Securities | JPY | 3.000.000.000 | 6,6% | 1988-1994 | JPY | 3.000.000.000 | 169.983.000 |
| Jydske Bank | DEM | 1.251.700 | Libor + 1,5% | 1988-1993 | DEM | 250.340 | 958.276 |
| Chase Manhattan | DEM | 60.000.000 | Libor + 0,25% | 1988-1994 | DEM | 60.000.000 | 229.674.000 |
| Westl B Europa | DEM | 20.000.000 | Libor + 0,5% | 1989-1994 | DEM | 8.000.000 | 31.006.400 |
| Westl B Europa | DEM | 170.000.000 | Libor + 0,625% | 1990-1997 | DEM | 160.555.556 | 614.590.580 |
| Chemical Bank | DEM | 120.000.000 | Libor + 0,65% | 1991-1996 | DEM | 120.000.000 | 459.348.000 |
| Chemical Bank | DEM | 110.000.000 | Libor + 0,75% | 1992-1995 | DEM | 110.000.000 | 421.069.000 |
| Chemical Bank, obl. | USD | 20.000.000 | Libor + 1,13% | 1992-1995 | USD | 20.000.000 | 122.492.800 |
| Nordfinanz Zürich | CHF | 10.000.000 | Libor + 0,75% | 1992-1997 | CHF | 10.000.000 | 42.580.000 |
| Vest B Europa | NLG | 140.000.000 | Libor + 0,75% | 1992-1995 | NLG | 40.959.625 | 140.032.768 |
| Top Danmark | DEM | 0.049.774 | Libor + 0,75% | 1992-1997 | DEM | 9.049.774 | 34.641.629 |
| Den Danske Stat | DKK | 850.000.000 | Diskonto | 1993-1998 | DKK | 850.000.000 | 850.000.000 |
| **Total i DDK** | | | | | | | **3.136.889.253** |

[1] Ved omregning til DKK er anvendt valutakurser pr. 25/5 1993.

1066

# Fyrispurningar

# 100-1. Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann í arbeiðaramálum, viðvíkjandi uppsøgnum av fólki í almennum starvi

Ár 1992, 19. august boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Hergeiri Nielsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

1. Hvussu nógv fólk eru og verða uppsøgd úr almennum starvi frá 1. januar 1991 til ársskiftið komandi. Hvussu vóru hesi størv skipað yrkisliga, og hvussu er býtið út á tann einstaka stovnin. Hvussu býta hesar uppsagnir seg út á ta einstøku kommununa.
2. Hvørji eru samsvarandi útlitini fyri 1993.
3. Hvussu nógvir løntakarar innanfyri almennu stovnarnar liggja omanfyri ávíkavíst 300.000 kr., 400.000 kr., 500.000 kr. og 600.000 kr. í samlaðari ainntøku, og hvussu er býtið út á stovnarnar og kommununar.

**Viðmerkingar:**

Í "Hagtíðindum" verður upplýst, at samlaða árligu lønargjaldingarnar eru alsamt lækkandi, og at tær størstu lækkingarnar eru at finna innanfyri lønir fyri vanligt arbeiði uppi á landi og fiskiskap. Lækkingin er upp ímóti einum triðingi innanfyri hesi øki. Aðrar størri lønarlækkingar eru at finna innan bygging, og fiskavirking, sum landsstýrið annars hevur boðað frá, at dentur varð lagdur á at menna frá ársbyrjan í 1991.

Tað verður ferð eftir ferð havt á lofti, at uppsagnirnar úr størvum hjá tí almenna í flestu førum eru millum tey ófaklærdu, samstundis sum almenn - og í ávísum førum ikki lýst - størv kosta feliri arbeiðsmannalønir hvørt. Um so er, so hómast eitt ávíst politiskt sikti í tí rikna lønarpolitikkinum.

Hildið verður, at løgtingið eigur at verða neyvari kunnað um endamálið í tí rikna starvsfólka- og lønarpolitikkinum, og eru omanfyri nevndu spurningar tí settir fram í teirri vón, at teir verða neyvt svaraðir og í seinasta lagi eftir 10 døgum, so sum tingskipanin ásetir.

**Svar**

**Ad 1:** Innan tað almenna eru tilsamans millum 180 og 190 søgd úr starvi síðan 1. januar 1991. Haraftrat eru 66 fólk farin niður í arbeiðstíð á Landssjúkrahúsinum.

Spurt verður eisiuú um, hvussu uppsagnirnar býta seg út á teir einstøku stovnarnar. Tann stovnurin, sum hevur sagt flest fólkum upp er Landsverkfrøðingurin, sum tilsamans hevur sagt 112 fólkum upp – 22 fastløntum og 90 tímaløntum, 40 fóru úr starvi, nú Kollafjarðartunnilin varð liguður. Næst kemur Landssjúkrahúsið við 34 uppsagnum, fólkini, sum uppsøgd eru, eru limir í feløgunum innan sjúkrahúsverkið. Innan postverkið eru 10 fólk farin úr starvi, men stava tær flestu uppsagnirnar frá, at aldursmarkið er farið niður í 67 ár, og verða flestu størvini sett aftur. Aftrat hesum kemur, at nøkur størv eru niðurløgd, tá tey vóru leys.

Restin av teim, sum uppsøgd eru, vóru lønt eftir sáttmála við avvarðandi yrkisfelag serliga Starvsmannafelagið. Á Gjaldstovuni eru 10 fólk uppsøgd, og eru 8 fólk søgd upp hjá heilsurøktini, men snýr tað seg ikki um full størv.

Viðmerkjast kann, at innan skúlaverkið eru umleið 90 størv færri nú enn í 1990, ongin er beinleiðis uppsagdur, men eru serliga vikarstørv ikki sett aftur. Innan aðrar stovnar hevur eisini verið ein náttúrlig frágongd av størvum, sum ikki eru sett aftur.

Samanumtikið kann sigast, at tað innan tað almenna starvast nógv færri fólk nú enn við ársbyrjan í 1991. Tilsamans snýr hetta seg um eini umleið 300 fólk færri.

Hvussu uppsagnirnar býta seg út á tær einstøku kommununar eru torført at siga nakað nágreiniligt um. Uppsagnirnar hjá Landsverkfrøðinginum og postverkinum býta seg javnt um landið, meðan tær innan sjúkrahúsverkið eru í Tórshavn.

Størvini, sum ikki eru sett aftur innan skúlaverkið, býta seg javnt um alt landið.

**Ad 2:** Tað ber í løtuni ikki til at siga, hvussu nógv fólk verða uppsøgd næsta ár. Men um fakfeløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum ikki ganga við til, at sáttmálarnir fara úr gildi í úrtíð, verða nógv almenn starvsfólk søgd úr starvi í næstum, orsakað av lønarniðurskurðinum á fíggjarløgtingslógini. Tað ber í løtuni ikki til at seta eitt nágreiniligt tal á, men má roknast við millum 200 og 300 størvum.

**Ad 3:** Áðrenn svarað verður upp á triðja spurningin, kann upplýsast, at lønarútreiðslurnar hjá tí almenna í 1991, sum vóru skattaðar, vóru 1.128.210.458,- kr.

Uppbýtið innan teir ymsu lønarbólkarnar innan landsumsitingina sær soleiðis út:

| Bólkur | Tal | Løn | Meðal |
|---|---|---|---|
| 0 - 99.000 | 5.494 | 127.616.201 | 23.592 |
| 100.000 - 199.000 | 2.526 | 381.256.899 | 150.933 |
| 200.000 - 299.000 | 1.976 | 470.879.889 | 238.300 |
| 300.000 - 399.000 | 320 | 107.526.113 | 336.019 |
| 400.000 - 499.000 | 60 | 27.218.689 | 453.645 |
| 500.000 - 599.000 | 13 | 7.182.181 | 552.475 |
| 600.000 - | 7 | 4.530.486 | 647.212 |
| Tilsamans | 10.396 | | |

Í 1991 hava 10.396 fingið lønarútgjalding frá tí almenna, men sum sæst eru í bólkinum 0 til 99.000 tilsamans 5.494, sum tilsamans hava fingið góðar 127 mió. kr. ella góðar 23.200,- kr. í meðal. Talan er sostatt ikki um fulltíðarstørv.

Tað sæst á omanfyristandandi yvirliti, hvussu nógvir løntakarar eru í teim ymsu hægst løntu bólkunum. Tey flestu, sum eru í hesum bólkum, eru fólk við hægri útbúgving. Læknar liggja í hesum bólki, teir flestu starvast í Tórshavn, men starvast ein partur á teim smærru sjúkrahúsunum. Lærarar innan tær hægru útbúgvingarnar eru eisini í hesum bólkum. Teir starvast bæði í Tórshavn, í Gøtu, Fuglafirði, Klaksvík, Tvøroyri, Vestmanna og í Vági. Viðmerkjast kann, at tað ikki er kannað, hvar hesir lærarar búgva. Restin av teim, sum fáa løn yvir 300.000,- kr. árliga, eru fólk, sum starvast innan meginfyrisiting – stjórar, akademiskir medarbeiðarar – og politikarar. Tey flestu, sum arbeiða innan meginfyrisiting, búgva í Tórshavn, meðan politikarar búgva um landið alt. Viðmerkjast skal, at tað ikki bert eru landsstýrismenn, sum liggja í hesum bólkum, men eisini løgtingsmenn, sum umframt lønina sum løgtingsmenn, hava annað alment starv.

Tey, sum forvinna omanfyri 500.000 kr. hava øll meira enn eitt starv.

# 100-2. Fyrispurningur til Jógvan Sundstein, landsstýrismann, viðvíkjandi skuld Landsstýrisins til Tvøroyra býráð fyri leigu av hølum til Suðuroyar HF-skeið á Tvøroyri

Ár 1992, 25. august boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Tordur J. Niclasen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Nær ætlar landsstýrið at gjalda áralongu skuld sína til Tvøroyra býráð fyri leigu av hølum til Suðuroyar HF-skeið á Tvøroyri?

**Viðmerkingar:**

Tað er eingin loyna, at mangar kommunur í dag hava torført við at fáa endarnar at røkka, og er tað tey seinru árini komið kommunum sera dátt við, at inntøkugrundarlagið í stóran mun hevur svikið.

Ein av roknaðu inntøkunum hjá Tvøroyra kommunu tey seinastu 17 árini hevur verið leiguinntøka frá Føroya landsstýri fyri leigu av hølum til Suðuroyar HF-skeið á Tvøroyri.

Í uppskoti til sáttmála frá Tvøroyra býráð í 1984, verður m.a. skotið upp, at leigugjaldið fyri tíðarskeiðið 1.8.75 til 31.7.83 verður sett til kr. 200.000 um árið og frá 1.8.83 kr. 300.000 um árið.

Sambært løgtingsfíggjarlógum tey mongu seinnu árini hevur løgtingið játtað pening til nevndu leigur, men er peningurin ongantíð komin til rætta viðkomandi, nevniliga Tvøroyrar býráð.

Umframt inntøkumiss, hevur kommunan øll hesi árini borðið útreiðslurnar av ljósi, hita og reingerð av nevndu hølum.

Verður roknað við leigugjaldi, sum uppskotið frá 1984 boðar frá, er talan um ikki færri enn 4,3 mió. kr., ið landsstýrið skyldar Tvøroya býráð fyri leigu frá 1975 at rokna, og er her ikki rentutap íroknað.

Tá hugsað verður um, at Tvøroyra kommuna - eins og aðrar kommunur - rokna leiguinntøkur við á inntøkusíðuni á fíggjarætlanini, er tað skiljandi, at gjaldføri hjá avvarðandi kommunu viknar, tá roknaða inntøkan ikki kemur í kommunukassan.

Hetta førir so aftur við sær, at kommunan hevur trupult við at klára tænastur og skyldur sínar yvirfyri borgarunum.

Tann sum sostatt verður meinast raktur av, at landsstýrið ikki hevur goldið skuld sína til Tvøroyar býráð, er borgarin í hesi kommunu.

Hvat skilst, er leigusáttmáli ongantíð undirskrivaður millum Tvøroyar kommunu og Føroya landsstýri, men sæst m.a. av fylgiskjølum til løgtingsfíggjarlógina 1987, at hesin tá skuldi koma í rættlag.

Hvør enn orsøkin er, at landsstýrið øll hesi ár ikki hevur goldið skuld sína til Tvøroyar kommunu, má ásannast, at hetta er ein órímilig og ótolandi viðferð av eini kommunu og borgarum hennara og eigur hetta tí sum skjótast at fáast í rættlag.

Loksins skal viðmerkjast, at Tvøroyra býráð tey seinru árini fleiri ferðir hevur heitt á landsstýrið um at fáa hesi viðurskifti í rættlag - tó uttan úrslit.

**Svar**

Suðuroyar HF-skeið varð sett á stovn í 1975. Tað varð ikki tá sett fram krav um gjald av leigu ella líknandi, tí kommunan vildi fegin fáa møguleika at bjóða sínum skúlanæmingum eina víðari útbúgving í Suðuroy, tá hetta vildi føra við sær eitt økt virksemi í kommununi.

17. oktober 1984 – næstan 10 ár aftaná, at skeiðið varð sett á stovn - vendir kommunan sær skrivliga til landsstýrið við uppskoti til leigusáttmála. Í hesum uppskoti verður skotið upp, at húsaleiga skal gjaldast heilt aftur til 1. august 1975.

Í hesum sambandi skal viðmerkjast, at landsstýrið í skrivi dagfest 26. mai 1981 fær boð frá kommununi um, at HF-skeiðið hevur fingið fleiri hølir at húsast í, og heldur ikki í hesum skrivi verður kravt, at landsstýrið skal gjalda fyri nýtsluna av hølunum.

Tá landsstýrið í 1984 fær omanfyri nevndu áheitan frá kommununi, sendir landsstýrið áheitanina til Landsskúlafyrisitingina til ummælis.

Aftan á at landsstýrið hevur fingið svar, verður Landsskúlafyrisitingin biðin um at taka upp samráðingar við býráðið um eina møguliga leigu.

Í januar 1986 sendir Landsskúlafyrisitingin landsstýrinum eitt uppskot til loysn á málinum. Men málið verður tó ikki loyst, og ikki fyrr enn 14. november 1989 kemur aftur skriv frá kommununi við áheitan um at fáa greitt leigumálið.

Landsstýrið setir seg aftur í samband við Landsskúlafyrisitingina og kommununa við athiti til at finna eina loysn, sum báðir partar kunnu góðtaka, hetta við tí úrsliti, at landsstýrið hevur fund við umboð fyri kommununa 19. august 1991 og 23. mars 1992.

Á seinasta fundinum, 23. mars 1992, verður leigumálið loyst, hvat figgjarárunum 1991 og 1992 til 1.8. viðvíkur, og partarnir eru samdir um at taka upp samráðingar um leiguna framyvir.

Men partarnir eru ikki samdir um upphæddina fyri árini undan 1991, við tað at tað løgfrøðiliga er talan um fyrningartrupulleikar.

Hetta er sostatt ein stutt gjøgnumgongd av málinum og út frá hesum kann sigast, at landsstýrið ikki metir, at talan er um eina skuld fyri nógv ár, men harafturímóti um eina skuld, sum partarnir í løtuni ikki eru samdir um. Landsstýrið kann tí ikki her í tinginum svara nágreiniliga, nær málið verður loyst, við tað at tað í síðsta enda møguliga verður rætturin, sum má avgera málið.

Landsstýrið fer tó at gera alt fyri, at málið verður loyst í sátt og semju og fer skjótast gjørligt at taka stig til ein semingsfund partanna millum.

Viðmerkjast kann eisini, at tað er rætt, at frá og við árinum 1985 til 1990 eru tiknar við 200.000 kr. sum leiguútreiðslur til Tvøroyrar kommunu fyri Suðuroyar HF-skeið, uttan at peningurin er brúktur til endamálið, tí sum áður nevnt er ikki semja fingin partanna millum.

# 100-3. Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, viðvíkjandi umsitingini á landssjúkrahúsinum (LS)

Ár 1992, 26. august boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Birgir Danielsen, Eliesar Arge og Bjarna Djurholm, løgtingsmonnum, sum var soljóðandi:

Í samband við pkt. 3 í landsstýrissemju frá 16. juli í ár,

1) metir so landsstýrismaðurin, at við atliti til frágreiðing frá sjúkrahússtjóranum pkt. 19, 22, 24 og 25, dagfest 21. juli 1992, rætt er atborið at taka allan avgerðarrætt frá sjúkrahúsleiðsluni?
2) er hetta í tráð við føroysku sjúkrahúslógina, ríkislóg nr. 621 frá 22. desember 1976, § 2, og reglugerð fyri sjúkrahúsverk Føroya nr. 70 frá 6. oktober 1977, §§ 3, 7, 8 og 9?
3) hevur landsstýrismaðurin ikki givið skeivar upplýsingar ella tagt við týdningarmiklum upplýsingum, tá avgerðin varð tikin á landsstýrisfundi, og kann hetta fáa fylgjur fyri hann sambært løgtingslóg nr. 102 frá 23. juni 1992, § 6, stk. 2?
4) er landsstýrismaðurin vísur í, at LS undir verandi umstøðum verður rikið fakliga og rakstrarliga optimalt?

**Viðmerkingar:**
Fyri at finna eina loysn á ósemjuni um sparingar, sum hevði tikið seg upp á LS, varð ein semja gjørd í landsstýrinum tann 16. juli 1992.

**Punkt 3 í semjuni var soljóðandi:**

"Álitið millum landsstýrið og sjúkrahúsleiðsluna er viknað. Landsstýrið metir ikki, at leiðslan í hesum máli hevur víst fíggjarliga og umsitingarliga ábyrgd.

Landsstýrið hevur tí samtykt, at ongar avgerðir ella tiltøk verða framd uttan beinleiðis góðkenning frá landsstýrinum.

Sama er galdandi fíggjarkarminum og virkseminum í 1993".

Grundarlagið undir hesi avgerð var, at landsstýrið metti, at sjúkrahússtjórin var farin útum sínar heimildir við mánadagin/týsdagin tann 29./30. juni at siga upp 94 starvsfólkum á LS uttan at kunna landsstýrið um hetta frammanundan.

Grundarlagið undir hesi avgerð er skeivt. Í hesum sambandi verður víst á "Frágreiðing um játtanina til LS í 1992" frá sjúkrahússtjóranum Høgna Joensen, dagfest 21. juli 1992.

Punkt 19 lýsir ein fund milluin løgmann, fíggjarmálaráðharran, heilsumálaráðharran, sjúkrahússtýrisformenninar, umsjónarmenninar og sjúkrahússtjóran. Á hesum fundi fekk sjúkrahúsleiðslan greið boð um, "at fíggjarkarmurin skuldi haldast".

Víst verður á soljóðandi brot úr frágreiðingini:

"Umsjónarmaðurin fyri LS upplýsti, at hetta fór at føra við sær hópuppsagnir, men svar landsstýrisins til hetta var, at játtanin óansæð skuldi haldast, og álegði landsstýrið leiðsluni at gera neyðugu tiltøkini."

Punkt 22 sigur víðari:

"Sjúkrahússtjórin kunnaði leiðaran á lønardeildini í landsstýrinum um uppsagnirnar og fekk upplýst, at starvsfólk skal hava móttikið uppsøgnina í seinasta lagi týsdagin tann 30. juni 1992."

Í punkt 24 stendur:

"Stýrisformaðurin fekk eisini mánamorgun spariuppskotið borið".

Endaliga í punkt 25:

"Somuleiðis fekk landsstýrismaðurin Jóannes Eidesgaard, spariuppskotið borið mánamorgun tann 29. juni, og bað hann sjúkrahússtjóran koma á fund seinnapartin sama dag hesum viðvíkjandi. Á fundinum gav landsstýrismaðurin eingi boð um, at tey ætlaðu tiltøkini ikki skuldu setast í verk."

Á almennum fundi sama kvøld (mánakvøldið 29. juni 1992), har Atli Dam, Jógvan Sundstein, Jóannes Eidesgaard og Høgni Joensen sótu í panelinum, varð spurningurin um uppsagnirnar, sum starvsfólkið hevði frætt um, men enn ikki hevði fingið, reistur. Sjúkrahússtjórin segði seg tá bert kunna steðga uppsøgnunum eftir boðum úr landsstýrinum. Tey boðini komu ikki.

Sostatt kann eingin ivi vera um, at landsstýrið visti um uppsagnirnar. Grundgevingin fyri pkt. 3 í samjuni er sostatt ikki haldbar.

Sjúkrahúsini verða umsitin eftir galdandi lóg, sum er:

"Lov for Færøerne om sygehusvæsenet nr. 621 af 22. december 1976". Í § 2 stendur: "Hvert af de 3 sygehuse – landssygehuset i Tórshavn, Klaksvig sygehus og Suderø sygehus – ledes af en bestyrelse på 5 medlemmer, hvoraf 3 udpeges af Færøernes Lagting og 2 af Landsstyret o.s.v."

Landsstýrið hevur so gjørt eina reglugerð fyri sjúkrahúsverk Føroya nr. 70, dagfest 6. oktober 1977.

Í § 7 stendur:

"At vera sjúkrahússtýrinum til handa í leiðsluni av sjúkrahúsverkinum, ráðleggingarnevndini í ráðlegging av útbygging sjúkrahúsverksins og til at sita fyri avgreiðsluskrivstovuni hjá sjúkrahúsverkinum setir Føroya landsstýrið ein sjúkrahússtjóra.

**2. stk.** Sjúkrahússtjórin er yvir fyri sjúkrahússtýrinum ansvarligur fyri tí gjøllari fyrisitingini av sjúkrahúsverkinum eftir tí stevnu, sum stýrini gera av og annars samsvarandi ta av landsstýrinum góðkendu starvslýsing fyri stjóran".

**§ 8:** "Grundað á innkomin uppskot frá teimum einkultu sjúkrahússtýrunum ger og sendir sjúkrahússtjórin landsstýrinum uppskot til fíggjarætlan fyri samlaða sjúkrahúsverkið.

**2. stk.** Sjúkrahússtjórin viðger og ger tilmæli til landsstýrið um uppskot frá sjúkrahússtýrunum um nýbygningar og størri bygningsbroytingar, nýgerð og nýkeyp."

**§ 9:** "Innanfyri karmin í góðkendari ársfíggjarætlan er sjúkrahússtjórin heimilaður til stýranna vegna at taka avgerð í sovorðnum málum viðvíkjandi sjúkrahúsanna rakstri og viðlíkahaldi, sum ikki vegna sína náttúr eiga at verða løgd fyri stýrini.

**Stk. 2.** Tann av stýrinum viðgjørda og góðkenda og av Føroya Løgtingi samtykta fíggjarætlan kann ikki farast upp um uttan við fíggjarnevndarinnar samtykt. Um ovnýtsla í roknskaparárinum verður hildin at vera neyðug, leggur sjúkrahússtjórin ovnýtsluna fyri fíggjarnevndina við viðmæli frá sjúkrahússtýrinum".

Sostatt er eingin ivi um, at sjúkrahússtýrini við stjóranum hava ábyrgdina av sjúkrahúsunum. Landsstýrið hevur sostatt ongar heimildir til at suspendera leiðsluna, sum punkt 3 í semjuni verður tulkað.

Verður hetta av einhvørjari orsøk kortini neyðugt, so má landsstýrið reisa tænastumannasak móti stjóranum og/ella viðvíkjandi stýrunum venda sær til løgtingið, sum setir 3 av 5 stýrislimum.

Niðurstøðan er sostatt greið: Landsstýrið hevur ongar heimildir at seta leiðsluna frá og sjálvt taka yvir. Lógloysi ræðnr sostatt á landssjúkrahúsinum í løtuni.

Løgtingslóg nr. 102 um ábyrgd landsstýrismanna hevur fingið gildi tann 24. juni 1992.

Í § 6 stendur:

"at landsstýrismaður verður revsaður, um hann á landsstýrisfundi ella í løgtinginum gevur skeivar upplýsingar ella um hann, tá landsstýrið ella løgtingið viðger eitt mál, tigur við upplýsingum, sum eru av stórum týdningi fyri landsstýrisins ella tingsins meting av málinum".

Eisini hesin spurningurin hevur verið reistur í fjølmiðlunum, har landsstýrismaðurin hevur verið skuldsettur fyri at siga ósatt sum grundarlag fyri eini sera vittfevnandi og ivasamari avgerð í sjúkrahúsmálinum.

Tá Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, ikki hevur avsannað hetta og í sínum svari ongar royndir hevur gjørt fyri at vísa aftur tí, sum sjúkrahússtjórin skrivar í síni frágreiðing, taka vit frágreiðingina hjá sjúkrahússtjóranum sum álítandi og sera álvarsama fyri landsstýrismannin. Lagt skal verða aftrat, at stýrið fyri LS váttar innihaldið í frágreiðingini.

Tað at landsstýrið tekur tað lógligu leiðsluna av ræði og sjálvt tekur samband við starvsfólk og/ella starvsfólkabólkar, skapar ein ótryggleika bæði í leiðsluni og millum starvsfólkið. Hetta er ímóti øllum elementerum og kendum leiðsluprinsippum. Hesin ótryggleiki gongur út yvir arbeiðslagið og effektivitetin, soleiðis at tann stevna, sum sett verður, hvørki fíggjarliga ella fakliga verður rokkin.

At sjúkrahúsið er eitt stórt kompleks og tí viðbrekið arbeiðspláss ger bert støðuna uppaftur verri.

Ein treyt fyri at fáa sum best burtur úr tí tilfeingi, sum vit nú einaferð koma at ráða yvir í framtíðini, er, at vit hava eina sterka og góða leiðslu, sum fær tann neyðuga snuðulin frá landsstýri og løgtingi, og sum ikki verður bakbitin, eins og hent er nú.

Tað er sostatt eingin ivi um, at sjúkrahúsverkið hevur verið meint rakt í seinastuni, og tá tað er ivasamt, um núverandi og ætlaða upphædd til rakstur av LS rúmast innan okkara framtíðar fíggjarlógarkarm, er tað uppaftur meira avgerandi, at samstarv og motivatión verða framd frá tí hægsta til tann lægsta innan sjúkrahúsverkið. Uttan hetta fáa vit ikki tað optimala úrslit burtur úr umsitingini av tilfeinginum, sum LS fær tillutað í framtíðini.

31. august 1992 svaraði Jóannes Eiesgaard, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

*Tað er fyrispurningur nr. 100-3/1992 viðvíkjandi umsitingini á landssjúkrahúsinum, har ið tann fyrsti spurningurin var í samband við punkt 3 í landsstýrissemjuni frá 16. juli í ár, metir so landsstýrismaðurin, at við atliti til frágreiðing frá sjúkrahússtjóranum punkt 19, 22, 24 og 25, dagfest 21. juli 1992, at rætt er atborið at taka allan avgerðarrætt frá sjúkrahúsleiðsluni?*

Til hetta er at svara, at landsstýrið er av teirri áskoðan, at rætt er atborið undir verandi umstøðum. Landsstýrið hevur tí mett tað sum neyðugt, at fara meira aktivt inn í stýringina av landssjúkrahúsinum.

Spumingur 2 var: Er hetta í tráð við føroysku sjúkrahúslógina, donsk lóg nr. 621 frá desember 1976, grein 2 og reglugerð fyri Sjúkrahúsverk Føroya nr. 70 frá 6. oktober 1977, greinarnar 3, 7, 8 og 9?

Til hetta er at svara, at sambært lóg og reglugerð er ásett, at tað skal veljast eitt stýrið og tað skal setast ein sjúkrahússtjóri og hesi eru vald og sett.

Spurningur 4 er um landsstýrismaðurin er vísur í, at landssjúkrahúsið undir verandi umstøðum verður rikið fakliga og rakstrarliga optimalt.

Til hetta er at svara, at umstøðurnar seinastu tíðina prógva, at tað optimala útnyttilsi av játtanini ikki hevur verið til staðar, og at neyðugar kanningar hesum viðvíkjandi eru ella verða fyrireikaðar.

Og við hesum eru fyrispurningarnir svaraðir.

# 100-4. Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, viðvíkjandi sjúkra- og læknaflutningi millum Nólsoy og høvuðsstaðin

Ár 1992, 26. august boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Bjarna Djurholm, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Hvat ætlar Føroya landsstýri at gera fyri at tryggja, at sjúkra- og læknaflutningurin millum Nólsoy og høvuðsstaðin verður betur skipaður.

**Viðmerkingar:**

Seinastu mongu árini hevur Strandferðslan røkt lækna- og sjúkraflutningin millum Nólsoy og høvuðsstaðin. Øll tey fyrstu árini var avtala galdandi millum Sjúkrahúsverkið og Strandfarskip Landsins, um at Ritan skuldi røkja henda flutning.

Fyri nólsoyingar var hetta ein nøktandi og trygg skipan, tí bæði koma læknahjálp skjótt fram, og bert í allar ringasta veðri slapst ikki at í Nólsoy.

Fyri umleið tveimum árum síðani varð henda avtala so uppsøgd og í staðin gjørd avtala um, at Tróndur skuldi røkja lækna- og sjúkraflutningin til Nólsoyar, umframt eisini í Sandoynna.

Tróndur liggur í Skopun um náttina, og fyrir hetta við sær, at lækna- og sjúkrahjálp til Nóloyar verður óvuliga tíðarkrevjandi. Tað kemur meira enn so fyri, at bíðast má eftir lækna í upp til tríggjar tímar. Hetta orsakað av, at Tróndur fyrst skal til Havnar eftir lækna, áðrenn hann kann fara til Nóloyar.

Harumframt er Tróndur illa nýtiligur til sigling til Nólsoyar á vetrartíð, tí illa gongur hjá skipinum at leggja at, tá vindurin er nógvur.

Fört hevur verið fram, at um neyðugt er við bráfeingis hjálp, hevur Sjúkrahúsverkið cina avtalu um tyrluflutning, men hevur hetta fleiri ferðir víst seg, tá brúk hevur verð fyri skjótari hjálp, at vera ein táta bert.

Støðan er tí í stuttum hon, at lækna- og sjúkraflutningurin til og úr Nósloy langt frá er nøktandi og tryggur í dag, eins og hann hevur verið heilt frá teirri tíðini, tá Reyði Krossur varð tikin í nýtslu sum lækna- og sjúkrabátur.

Seinastu tvey árini hava tíverri verið dømi um, at læknahjálpin er komin ov seint á staðið, og mugu hesi viðurskifti metast at vera ótolandi.

Hóast øllum er greitt, at neyðugt er at spara í hesum trongu tíðum, so eiga nólsoyingar ikki at vera verri fyri enn aðrir fbúgvar landsins í slíkum álvarsmálum, og kann tað heldur ikki vera rætt, at talan kann gerast um kostnað mótvegis mannalívum. Verður tikið samanum, er ilt at síggja, at nýggja skipanin í rakstri er bíligari enn tann gamla.

Tá so er, má tað metast at vera bráneyðugt, at landsstýrið endurskoðar og betrar lækna- og sjúkraflutningin millum Nólsoy og Havnina.

28. september 1992 svaraði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fyrispurningunum soleiðis:

**Svar**

Tað er rætt, sum fört verður fram í viðmerkingunum til fyrispurning, at Strandferðslan við Rituni í mong ár hevur røkt lækna- og sjúkraflutningin millum Nólsoy og høvuðsstaðin.

Sum ein liður í sparingunum, varð henda avtala uppsøgd fyri umleið tveimum árum síðani. Í staðin skuldi so Tróndur, sum um náttina liggur í Skopun, røkja hesa tænastu.

Eg eri púra samdur við Bjarna Djurholm, løgtingsmanni, í, at í mun til ta gomlu avtaluna var henda munandi verri.

Hinvegin er tað ein sannroynd, at um umstøðurnar krevja og loyva tí, so verður tyrlan nýtt. Men sjálvandi kunnu veðurlíkindini gera tað, at tað ikki er flúgvandi. Umstøðurnar hjá tyrluni at lenda í Nólsoy eru ikki av teimum bestu, tí ongin tyrlupallur er. Men hóast hetta, so er tyrlan ikki at verða fyri uttan, tá ið skjótt skal berast at, ella tá ið umstøðurnar eru serliga truplar.

Við brævi, dagfest 8. september 1992 hevur Strandferðslan fingið boða frá landsstýrinum um, at Ritan skal brúkast í sambandi við lækna- og sjúkraflutning til Nólsoyar, og er hon tí í dag umfatað av stand-by avtaluni, og røkir hon fult nøktandi lækna- og sjúkraflutningin úr Nólsoy til Havnar.

Sostatt kann fyrispurningurin svarast við, at málið er loyst.

# 100-5. Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, viðvíkjandi sjúkrahúsunum í Suðuroy og Klaksvík

Ár 1992, 26. august boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Niels Paula Danielsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Er tað ætlan landsstýrisins, at sjúkrahúsini í Klaksvík og í Suðuroy fyri framtíðina skulu vera eitt slag av skaðastovu hjá landssjúkrahúsinum?

**Viðmerkingar:**

Upplýst er, at ortopediski yvirlæknin á Klaksvíkar sjúkrahúsi tey seinastu 24 árini frá 24. august í ár skal arbeiða á landssjúkrahúsinum fyribils í 2 mánaðir, og at tað er ivingarsamt, um hann kemur norðuraftur til Klaksvíkar.

Samtíðis verður upplýst, at medisinski yvirlæknin á Klaksvíkar sjúkrahúsi hevur sagt upp til 1. oktober, tí at eingin hjálparlækni er settur á deildina.

Fólk í Norðuroyggjum kenna seg tí ótrygg og spyrja, um landsstýrið ætlar at minka um virksemið á sjúkrahúsinum í Klaksvík og í Suðuroy, soleiðis at hesi sjúkrahús koma at vera eitt slag av skaðastovum hjá landssjúkrahúsinum.

# 100-6. Fyrispurningur til Maritu Petersen, landsstýrismann, viðvíkjandi loyvi til nærvarp í Føroyum

Ár 1992, 28. september boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Tordi J. Niclasen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Nær ætlar landsstýrið at geva loyvi til nærvarp í Føroyum.

**Viðmerkingar:**

Fyri 1,5 árum síðan reisti undirritaði spurning á tingi viðvíkjandi ætlan landsstýrisins um nærvarp her á landi.

Í viðmerkingunum til fyrispurningin var m.a. víst á ta demokratisering, sum tey seinnu árini var farin fram á hesum øki í grannalondum okkara, har fleiri sokallað nærvarp vóru farin at virka.

Eisini varð víst á, at í fleiri ár høvdu einstaklingar og felagsskapir havt ætlanir um lokal-og nærvarp her á landi, og í tí sambandi sent landsstýrinum umsókn, tó uttan at nakað ítøkiligt var komið burtur úr.

Í svarinum til fyrispurningin varð m.a. sagt, at landsstýrið arbeiddi miðvíst við spurninginum, og at nevnd sat og arbeiddi við málinum. Víðari varð upplýst, "at allar umsóknir frá áhugaðum fyri nærvarpi ganga inn í arbeiðstilfarið hjá nevndini. Nevndin arbeiðir seriøst við spurninginum demokratisering á fjølmiðlaøkinum - og er medvitandi um tann týdning, pressufrælsið hevur í einum demokratiskum samfelagi."

Loksins varð sagt frá, at nevndararbeiðið skuldi verða liðugt á sumri 1991, og kundi tá støða takast til eitt nú spurningin um nærvarp.

Eftir drúgt og gott arbeiði legði nevndin álit úr hondum í juni 1991. Viðvíkjandi spurninginum um nærvarp sæst í álitinum, at nevndin er samd um, at tað skal vera loyvt at senda nærútvarp og nærsjónvarp - og gevur hon hetta tilmæli við teirri grundgeving, at hetta fer at styrkja talifrælsi og við hesum eisini fólkaræðið.

Nevndin mælir annars til, at byrjað verður við einari 2 ára royndartíð og at nærvarpingin eigur at verða skipað soleiðis, at sent kann vera á egnum sendara til eitt geografiskt avmarkað øki (økisnærvarp). Harumframt eigur tað eisini at

verða skipað so fyri, at tað skal verða møguligt at keypa avlopstíð á verandi sendinetum, sum ÚF og SVF brúka í dag, fyri kostprís (áhugavarp).

Nú tá meir enn eitt ár er farið síðan nevndin kom við sínum tilmæli til landsstýrið, loyvir undirritaði sær enn einaferð at reisa spurningin um, nær politisk avgerð verður tikin og loyvi til nærvarp gerst veruleiki her á landi.

Marita Petersen, landsstýriskona, svaraði fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

Í viðmerkingunum til spurningin verður upplýst, at sami løgtingslimur í løgtingsmáli nr. 100-3/1990 (vetrarting): Viðvíkjandi loyvi til nærvarp í Føroyum, setti mær fyrispuringin: "Hvørjar ætlanir hevur landsstýrið við nærvarpi, og nær kann væntast, at loyvi til nýtslu av slíkum sendihátti verður givið?"

Eisini verða í viðmerkingunum til spurningin nevnd høvuðspunktini í svari mínum av 18. apríl 1991 til tann fyrispurningin, har eg greiddi frá tí nevndararbeiði, sum tá fór fram um hendan og aðrar spurningar innan útvarps- og sjónvarpslóggávuøkið, og har eg nevndi, at allar umsóknir frá áhugaðum fyri nærvarpi gingu inn í tilfarið hjá nevndini, og upplýsti, at nevndararbeiðið væntandi fór at verða liðugt á sumri 1991, og at landsstýrið tá hevði grundarlag fyri at taka støðu til spurningin um eitt nú nærvarp.

Nevndin handaði landsstýrinum álit sítt um útvarp og sjónvarp og aðrar fjølmiðlaspurningar í juli 1991 við hesi niðurstøðu:

"Galdandi útvarpslóg, løgtingslóg nr. 23 frá 28. mars 1956, hevur við smærri broytingum verið galdandi, síðani útvarp varð stovnað í Føroyum, tað er í 35 ár.

Galdandi sjónvarpslóg, løgtingslóg nr. 77 frá 21. mai 1982, hevur uttan broytingar verið galdandi, síðani alment sjónvarp varð sett á stovn í Føroyum, tað er skjótt 10 ár.

Tá so er, og tá hugsað verður um, hvussu stór og skjót menning fer fram á hesum fjølmiðlaøkjunum, er niðurstøða nevndarinnar, at úrslitið av nevndararbeiðinum eigur at verða lagt fyri landsstýrið sum uppskot til heilt nýggja lóggávu um útvarp og sjónvarp í Føroyum, heldur enn sum uppskot til broytingar í galdandi útvarps- og sjónvarpslóggávu.

Eftir hesum setir nevndin fram uppskot til løgtingslóg um útvarp og sjónvarp, ið er viðheft álitinum sum skjal 4."

Síðani nevdin handaði landsstýrinum álitið, hevur landsstýrið við áheitan um ummæli sent álitið til fjølmiðlarnar, útvarps- og sjónvarpsnevndirnar, allar kommunur og fleiri felagsskapir o.o., og fleiri av teimum nevndu hava sent landsstýrinum væl gjøgnumarbeidd og rúgvusmikil ummæli.

Tað er eftir hesum framvegis áskoðan landsstýrisins, at spurningurin um nærvarp í Føroyum ikki eigur at verða tikin til sjálvstøðuga viðgerð burtur úr tí fjøl-

miðlaheild, har hann náttúrliga hoyrir heima, men at hann eigur at verða viðgjørdur sum ein av teimum nógvu spurningum um útvarps- og sjónvarpsviðurskifti, sum støða skal takast til, áðrenn eitt lóggávuuppskot er greitt at leggja fyri løgtingið.

Frammanfyri umrødda nevnd setti tó ikki - sum sagt verður í niðurstøðuni í álitinum - fram nakað uppskot til løgtingslóg um útvarp og sjónvarp.

Út frá álitinum og tí rúgvusmikla ummælistilfarinum arbeiðir landsstýrið við at gera eitt slíkt uppskot til nýggja útvarps- og sjónvarpslóggávu, og ætlan landsstýrisins er, at uppskotið skal vera klárt at leggja fyri løgtingið í hesi tingsetu.

# 100-7. Fyrispurningur til Jógvan Sundstein, landsstýrismann, viðvíkjandi nýtsluni av P-talinum í samskiftinum millum Toll- og skattavaldið í samband við MVG-skipanina

Ár 1992, 21. oktober boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Tordi J. Niclasen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Við hvørji lógarheimild loyvir landsstýrið at P-talið verður nýtt í samskiftinum millum Toll- og skattavaldið í samband við MVG-skipanina?

**Viðmerkingar:**

Í samband við, at Toll- og Skattastova Føroya hevur sent út oyðubløð til "Fráboðan um skráseting í vinnuskránni", verður í hesum oyðiblaði undir teigi G kravt, at P-talið hjá eigara/eigarum í avvarðandi fyritøku verður upplýst.

Spurningurin viðvíkjandi P-talinum hevur verið nógv umrøddur her á tingi tey seinnu árini og varð fyri stuttum á tingi samtykt, at P-talið ikki skuldi nýtast í samskiftinum millum peningastovnar og skattavaldið.

Hvat samskiftinum millum toll- og skattavaldið viðvíkur, nú MVG-skipanin verður sett í verk, er eftir øllum at døma, ætlan myndugleikans at nýta P-talið í hesum samskifti.

Spurningurin, sum í hesum sambandi tekur seg upp, er við hvørji lógarheimild hetta samskifti við P-tals nýtsluni verður framt.

Tað, at Toll- og Skattastovan nú er vorðin ein stovnur, kann ikki rættvísgera ætlaðu nýtsluna av P-talinum.

Tí verður spurningurin reistur rætta viðkomandi, nevnliga landsstýrismanninum í toll- og skattamálum.

27. oktober 1992 svaraði Jógvan Sundstein, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar:**

Fyrst skal verða sagt frá, at P-talið ikki skal nýtast í samskiftinum millum toll- og skattavaldið í sambandi við MVG-skipanina.

Fyrst í oktober í ár varð eitt skrásetingarblað sent føroyskum virkjum. Upplýsingarnar í skrásetingarblaðnum skulu nýtast til eina vinnuskrá, ið fyrst og fremst skal nýtast í samband við umsiting av inntøkuskatti, meirvirðisgjaldi og tolli.

Í viðmerkingunum til teig G verður sagt, at tá talan er um einkultmansfyritøku, skal p-tal og navn eigarans skrivast, og tá talan er um íognarfeløg, skulu p-tøl og nøvn á øllum eigarum tilskilast. Í hesum sambandi skal verða upplýst, at hetta er neyðugt í sambandi við umsitingina av inntøkuskattinum.

Í viðmerkingunum til teig G verður síðani sagt, at tá talan er um aðrar virkishættir, t.d. partafeløg, lutafeløg, stovnar o.s.fr., skulu p-tøl og nøvn hjá øllum fulltrúum og nevndarlimum skrivast. - Upplýsast skal, at p-talið í hesum sambandi ikki verður teiduskrásett. Nevnast kann, at avmarkingin fyri nýtslu av p-tali er at finna í § 9, stk. 2 í løgtingslóg nr. 62 frá 5. juni 1984 um evnisskráir hjá almennum myndugleikum, og at henda lóg hevur gildi fyri edv-skráir.

Støða verður her ikki tikin til, um meirvirðisgjald, ið sambært altjóða frøðiheiti verður roknað sum skattur, kann roknast sum skattur sambært § 9 í omanfyri nevndu skrásetingarlóg.

# 100-8. Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, um hvussu langt landsstýrið er komið í kanning um trygging av lánum í sethúsum og íbúðum

Ár 1992, 21. oktober boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Hergeir Nielsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

1. Hvussu langt er landsstýrið komið í starvi sínum við at kanna málið um trygging av lánum í sethúsum og íbúðum, sum løgtingið álegði landsstýrinum at gera fyri tveimum árum síðan, og nær kann roknast við, at henda kanning verður løgd fyri tingið, so sum samtykt varð.
2. Hvørjar tankar hevur landsstýrið gjørt sær fyri at fyribyrgja, at botnurin fer undan sethúsamarknaðinum, at fólk í hópatali gerast húsvill, og um so er, hvussu ætlar landsstýrið so at loysa hetta mál?

**Viðmerkingar:**

Í samband við fráboðan landsstýrisins um munandi inntriv í gjaldføri hins einstaka, gerst tað nú øllum greitt, at munandi tyngri verður at liva í Føroyum.

Ein stór sethúsabygging og harvið privat skuldarbinding er farin fram í Føroyum seinastu 10-15 árini og kann ikki sigast annað enn, at húsaeigarar við stórum lánum í nýggjum eins og í gomlum húsum verða við skerdan lut, nú landskassin fer við enn størri parti av tí gjaldi, sum var ætlað til rentur og avdráttir, tá ið bygt varð ella lán vóru tikin upp við húsunum í veð.

Av sjúku, vanlukku ella deyða kennist tað burturav torført, tá ið bert annar hjúnafelagin situr eftir við lánsbyrðini, sum tá verður steinur oman á byrðu, og verður tí fregnast eftir møguleikum fyri at tryggja seg móti tílíkum missi, so sum gjørligt er í øðrum londum.

Inntøkumissur, sum stendst av arbeiðsloysi, lønarmiðurskurði, okursskatti, meirvirðisgjaldi o.ø. hevur eisini við sær, at fólk gerast húsvill, og verður tí fregnast eftir, hvørji tiltøk landsstýrið ætlar at seta í verk fyri at bjarga teimum fólkum, sum av almennum ávum gerast húsvill.

17. november 1992 svaraði Jóannes Eidesgaard, landstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

**ad 1:** 25. mai 1990 samtykt løgtingið at áleggja landsstýrinum at kanna málið um trygging av lánum í sethúsum og íbúðum og at leggja kanningina fyri tingið tingsetuna eftir.

Vegna tess at Almanna- og Heilsudeildin í landsstýrinum var undirmannað, bar ikki til at gera hesa kanning tá.

Í september í ár tók landsstýrið arbeiðið við kanningini upp aftur og ætlar landsstýrið at leggja kanningarúrlitið fyri løgtingið í hesi tingsetu.

Eitt, sum í løtuni verður kannað, er, um tørvur er á lóggávu innan økið.

Landsstýrið fer fyrsta dagin at taka málið upp við Tryggingarsambandið og peningarstovnarnar, herundir Húsalánsgrunnin.

**ad 2:** Landsstýrið hevur í løtuni samráðingar við peningastovnarnar um at fáa útlánsrentuna setta niður. Um peningastovnarnir ganga við til eina rentulækking, fer hetta at verða stór hjálp hjá teimum, sum sita við sethúsalánum. Somuleiðis kannar landsstýrið møguleikan fyri at fáa rentustøðið hjá Húsalánsgrunninum lækkað nakað aftur. Ein rentulækking bøtir eisini møguleikarnar fyri at keypa sethús og íbúðir, sum eru á marknaðinum.

# 100-9. Fyrispurningur til Jógvan Sundstein, landsstýrismann, viðvíkjandi arbeiðsuppgávum hjá kommunalum stovnum

Ár 1992, 29. oktober boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Lassa Klein, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

1. Hvar gongur markið fyri, at tað almenna kann taka kapping upp við privata arbeiðsmarknaðin?
2. Er tað í samsvar við kommunulógina, at kommuna miðvíst fer inn á øki, sum privat vinnurekandi hava røkt í fleiri ár?
3. Hevur Brandstøðin í Havn - ella Tórshavnar Býráð rætt til at fara inn á eitt øki, sum hevur verð røkt væl og fyrimyndarliga av privatari fyritøku?
4. Hevur kommunan ikki skyldu til at gjalda viðkomandi endurgjald fyri mista inntøku?

**Viðmerkingar:**

Tað er vorðið alment kent, at ávísir kommunalir myndugleikar (eisini almennir stovnar) hava upparbeitt eina tænastu, sum í størri og størri mun hava tikið kappingina upp við privat vinnurekandi. Talan er um arbeiði, sum náttúrliga hoyra heima í privatu vinnuni.

Hetta verður gjørt fyri at varðveita almenn arbeiðspláss, men hugsað verður ikki í nóg stóran mun um, at arbeiðsgevarar, sum kappast verður ímóti, eru við til at gjalda fyri egnan fíggjarligan undirgang.

Vaskarfið á Landssjúkrahúsinum er eitt gott dømi, men eisini aðrar fyritøkur eru fyri harðari kapping, t. d. ein privat fyritøka í Havn, sum síðani 1980 - í eini 12 ár hevur rikið hjálpar- og bjargingartænastu uppi á landi, og hevði inntil fyri fáum árum síðani havt uml. 80% av allari koyring, tá tað snúði seg um upptak av bilum, sum vóru komnir illa fyri orsakað av hálku ella bilóhappum.

Í dag er koyringin minkað niður um 20%, og orsøkin er hon, at Brandstøðin í Havn við hjálp frá Tórshavnar Býráð hevur tikið kappingina upp við privat vinnurekandi, hevur útbygt tænastuna við tí úrsliti, at kommunala uppíleggingin hevur máað støðið undan vinnugrundarlagnum hjá viðkomandi, og hevur ført við sær so stórt fíggjarligt tap, at bert eitt undur skal til fyri, at viðkomandi skal klára sínar skyldur.

Tað undrar, at almennir myndugleikar soleiðis taka kappingina upp við privat vinnurekandi og brúka skattaborgarans pening at uppihalda óneyðuga umsiting, umframt at máa støðið undan virkseminum hjá privatum vinnurfyritøkum, og tí loyvir undirritaði sær at seta landsstýrinsmanninum í kommunumálum fylgjandi spurningar.

13. november 1992 svaraði Jógvan Sundstein, landsstýrismaður fyrispurninginum soleiðis:

**Svar:**

**ad 1:** Okkara samfelagsskipan og lóggáva kann sigast at hava sum fortreyt eitt ávíst uppgávubýti millum almenna og privata sektorin. Men tað er ikki møguligt at seta eitt alment galdandi mark millum, hvørjar uppgávur eru privatar og hvørjar almennar.

**ad 2 og 4:** sum kunnu svarast undir einum: Sum útgangsstøði hevur verið roknað við, at kommunumar skulu hava lógarheimild fyri teimum uppgávunum, tær taka sær av. Men hetta er bert eitt útgangsstøði. Tí undantøkini frá hesum eru mong, m.a. tær "traditionellu" kommunalu uppgávumar so sum el, vatn, kloakering, renovatión - til vit fingu umhvørvisverndarlógina - bussrutur, sløkkiliðsmál v. m. Eingin lógarheimild hevur verið fyri, at kommunur tóku sær av hesum málum, men ivi hevur ikki verið um, at hetta vóru lógligar kommunalar uppgávur, eisini um hetta hevur við sær kapping við privat vinnurekandi. Harumframt kann tað vera lógligt, at ein kommuna átekur sær eina uppgávu, sum ikki í sjálvum sær er ein lóglig kommunal uppgáva, men sum hevur eitt tílíkt samband við eina aðra lógliga kommunala uppgávu, at tað hevði verið óríminligt ikki at loyvt kommununi at átikið sær uppgávuna. Tær seinast nevndu uppgávumar kunnu vera lógligar, men um tær eru tað konkret, má avgerast í hvørjum einstøkum føri. Landsstýrið kann taka støu til tílíkar spurningar. Endalig avgerð má tó takast av dómstólunum, men bert fá tílík mál hava verið løgd fyri rættin.

Mín meting av tí, sum beinleiðis verður spurt um í spurningunum 2 og 3 er, at tað er í stríð við góða siðvenju, at kommuna fer inn á øki, sum privat vinnurekandi hava røkt fyrimyndarligt í fleiri ár, um kappingin avlagast av, at kommunan ger sær dælt av síni støðu sum almennur skattainnkrevjandi stovnur og myndugleiki. Kappingin má vera frí og á líka føti.

**ad 4:** Kommunur eru endurgjaldsskyldugar eftir vanligum endurgjaldreglum, og er ein kommuna ólógliga komin inn á vinnuøki hjá privatum vinnurekandi soleiðis, at hesin hevur havt tap av hesum, kann endurgjald koma upp á tal. Men eitt tílíkt krav kann bert rætturin taka støðu til.

# 100-10. Fyrispurningur til Maritu Petersen, landsstýrismann, um góðkenning av undirvísingar-tilfari í fólkaskúlanum

Ár 1992, 30. oktober boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Niels Pauli Danielsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Hvat ger landsstýrið fyri, at undirvísingartilfarið í fólkaskúlanum verður lagt fyri lærararáðini og góðkent av skúlanevndunum, sum løgtingslóg um skúlafyrisiting sigur smb. § 13, stk. 2, og § 29. stk. 2?

**Viðmerkingar:**

Løgtingslógin um fólkaskúlan leggur dent á at skapa gott samstarv millum skúla og heim. Endamálsgreinin, § 2, stk. 3, sigur: "Fólkaskúlin skal í sátt og samvinnu við heimini hjálpa til at geva næmingunum eina kristna og siðalagsliga uppaling."

Góðkenningin av undirvísingartilfarinum, ið nýtt verður í skúlunum, er latin upp í hendurnar á skúlanevndunum, sum skulu umboða heimini, og trúarmyndugleikunum, hvat ið átrúnaði viðvíkur.

Tað hendir tó í heilum, at foreldur kenna seg illa við og verða órógvað av tí tilfari, sum nýtt verður í skúlunum, og spyrja, hvør ið góðkent hevur.

Soleiðis er eisini í hesum døgum, nú ið framførdur verður sjónleikur í skúlunum, sum viðger eyðkvæmi á ein sovorðnan hátt, at tað fellur mongum fyri bróstið og eggjar til siðloysi.

Fólk úr ymiskum skúlanevndum í landinum hava av hesum orsøkum tikið seg saman og heitt á Landsskúlaráðið og Landsskúlafyrisitingina um at ansa eftir, at lógin um fólkaskúlan og skúlafyrisiting verður hildin, soleiðis at skúlanevndirnar verða kunnaðar um, hvat ið fer fram í skúlunum.

Tað kann tykjast, sum skúlanevndarlimir fáa ikki alla ta kunning, teir ynskja, og heldur ikki altíð verða eftirspurdir, sum lógin ásetir.

Tí verður hesin fyrispurningur settur landsstýrismannininum í skúlamálum.

15. desember 1992 svaraði Marita Petersen, landsstýriskona, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

Sum beinleiðis svar upp á fyrispurningin kann eg fyrst upplýsa, at nevnda § 13, stk. 2 í kapittul 2 um fólkaskúlan í løgtingslóg um skúlafyrisiting nr. 58 2. oktober 1978 millum annað ásetir, at skúlanevndin eftir tilmæli frá lærararáðnum góðkennir, hvørji undirvísingaramboð skúlin skal nýta, heruppií hvørji undirvísingaramboð skulu vera í skúlabókasavninum. Eg kann eisini í hesum sambandi vísa til rundskriv nr. 1 frá 12. mars 1982 um nærri reglur um virksemi lærararáðsins og felgslærararáðsins, sum landsskúlaráðið hevur fyrisett sambært § 29, stk. 5 í nevndu løgtingslóg.

Her er sostatt talan um eina ásetan í eini løgtingslóg, sum skúlanevndin og lærararáðið, har eisini leiðsla skúlans er umboðað, sjálvandi skulu halda.

Um henda mannagongd ikki verður fylgd, má tann, sum ásannar hetta, gera vart við tað á rætta staði og um neyðug senda eina klagu samsvarandi § 32 í nevndu løgtingslóg, har ásett er: "Klaga yvir avgerðir, ið tiknar verða av skúlamyndugleikunum á staðnum, kann, uttan so at annað er ásett við ella við heimild í lóg, innan 6 vikur frá fráboðan um avgerðina skjótast inn fyri landsskúlaráðið av teimum myndugleikum, feløgum ella persónum, sum avgerðin viðvíkur. "Sambært reglugerð fyri landsskúlastjóran nr. 3 frá 2. januar 1980 § 6, stk. 1, pkt. f) Hevur landsskúlaráðið m.a. tillutað landsskúlastjóranum at vera kærustovnur í teimum avgerðum, sum myndugleikarnir á staðnum, skúlin ella stovnurin hevur tikið.

Eg kann leggja afturat, at um landsstýrið frættir, at nevnda mannagongd ikki er fylgd, sendir landsstýrið landsskúlafyrisitingini málið til ummælis og/ella avgreiðslu við tí fyri eyga at fáa hesi viðurskifti í rættlag.

Um vit nú fara frá sjálvum spurninginum til viðmerkingarnar til spurningin, skilst, at beinleiðis orsøkin til, at spurningurin verður settur mær, er, at Leikarafelag Føroya millum annað á summum fólkaskúlum í landinum hevur framført sjónleikin: "Liva tikarar í Congo?"

Í viðmerkingunum til fyrispurningin sigur spyrjarin eisini frá, at fólk úr ymiskum skúlanevndum í landinum í hesum máli hava "tikið seg saman og heitt á landsskúlaráðið og landsskúlafyrisitingina um at ansa eftir, at lógin um fólkaskúlan og skúlafyrisitingin verður hildin, soleiðis at skúlanevndirnar verða kunnaðar um, hvat ið fer fram í skúlanum."

Til hetta má eg svara, at tá vit hava eina løgtingslóg um fólkaskúlan, sum hevur reglur um, á hvønn hátt undirvísing og annað innan fólkaskúlan verður skipað, og eina løgtingslóg um skúlafyrisiting, sum gevur greiðar reglur um, hvørjir skúlamyndugleikarnir eru, og á hvønn hátt skúlamyndugleikarnir á staðnum virka, hvør innan sítt skúlaøki, og herumframt um, hvørjar klagumøgu-

leikarnir eru, mugu skúlanevndarlimirnir útinna sítt arbeiði eftir hesum reglum, tað er í avvarðandi skúlanevnd, og - um teir ikki meta seg fáa sømdir har - nýta heimildina at klaga í løgtingslógini um skúlafyrisiting.

# 100-11. Fyrispurningur til John Petersen, landsstýrismann, um veiðu eftir jákupsskel og kanningar av havbotninum

Ár 1992, 4. november boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Niels Paula Danielsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Hvat siga kanningar av havbotninum um skeljaveiðu undir Føroyum?

Á hvørjum økjum fer veiða eftir jákupsskel fram í dag, og hví fáa útróðrarmenn ikki at vita, hvar ið loyvt er skeljabátum at royna?

**Viðmerkingar:**

Stór misnøgd var við royndirnar hjá "Fame" eftir skeljum norðanfyri í 1990 og 1991. Tá var upplýst, at royndir skuldu gerast og kanningar av havbotninum.

Útróðrarmenn vildu tá vera við, at trolingin eftir skeljum órógvaði lívið á botninum og forkom møguleikunum hjá gýtingarfiski at fáa nakað undan.

Kanningar aðrarstaðni fingu menn at vera varnar við at geva loyvi til tílíka troling. Tí verður spurt eftir, hvat ið tær føroysku kanningar siga.

Klaksvíkar Útróðrarfelag hevur spurt bæði V&B og Fiskivinnuumsitingina í landsstýrinum, hvar ið troling eftir jákupsskel er loyvd, men hevur fingið at vita, at tað verður ikki upplýst.

24. november 1992 svaraði John Petersen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

**ad 1:** Fiskirannsóknarstovan skipaði fyri kanninum av havbotninum við sjókaga á skeljaleiðunum eystanfyri Nólsoynna í 1988 og í 1991 á økjunum eystanfyri og norðanfyri. Eisini vórðu myndir tiknar av havbotninum, har sum skeljadreggj vóru nýtt. Kanningin gav ikki beinleiðis ábending um, á hvønn hátt

skeljafiskiskapurin ávirkar annan fiskiskap á somu leiðum ella gýtingarstovnin hjá øðrum fiskasløgum, men vísti nakað um, hvussu nógv skel var knúst á havbotninum. Royndir úr Barentshavinum sýna tó, at júst á hesum havleiðum, har skeljastovnurin var at kalla fiskaður burtur seinast í áttatiárunum, er nú almikið til av øllum fiskasløgum.

Stovnsmetingar av jákupsskeljastovninum vísa, at stovnurin er munandi størri enn higartil mett. Fiskirannsóknarstovan heldur ikki, at royndirnar eystanfyri Nólsoynna og norðanfyri hava minkað um stovnin.

Síðani 1986 hevur bert eitt skip veitt jákupsskel eystanfyri og eitt skip norðanfyri í avmarkaðum tíðarskeiðum. Royndir norðanfyri helt uppat í 1990/91 (desember/januar).

Veiðan eystanfyri hevur verð støðugt vaksandi síðani 1970, tí skift hevur verið millum innara og ytra øki og har, sum ikki hevur verið roynt áður. Fiskirannsóknarstovan mælir til at gagnnýta alla leiðina eystanfyri.

Til tess at gagnnýta tilfeingið mest møguligt undir Føroyum, og tá havt verður í huga, at tað ikki eru beinleiðis vísindaligar ábendingar um, at hesin fiskiskapur ger skaða á annan fiskiskap og gýtingarstovnin, má tað verða rætt at lata skeljaveiðuna halda fram eystanfyri Nólsoynna.

**ad 2:** Veiðan í dag fer bert fram við einum skipi eystanfyri Nólsoynna. Loyvið er givið til at royna eystanfyri Nólsoynna uttan beinleiðis avmarkingar, tí tað hevur altíð verið flutt millum innaru og ytru leiðina. Sostatt er loyvt at royna allastaðni eystanfyri Nólsoynna, har sum jákupsskel er at finna. Mett verður á hvørjum ári um mest loyvdu veiðunøgd.

Tá roynt verður á øðrum leiðum eystanfyri, enn higartil hevur verið vanligt, so kann hetta hava við sær samanstoyt millum veiðihættir. Tað er tó ivasamt, um fiskiskapurin hjá tí eina skipinum eystanfyri hevur verið orsøk til trupulleikar hjá øðrum fiskiførum á hesi leið.

Uppá fyrispurning frá útróðrarmonnum hevur verið svarað, at fiskiloyvini verða latin til eigara og bát og avrit verða ikki latin øðrum uttan eftirlitinum, men V&B hevur upplýst upp á fyrispurning, at skipið hevur loyvi at royna allastaðni eystanfyri Nólsoynna.

# 100-12. Fyrispurningur til Jógvan Sundstein, landsstýrismann, viðv. trongstøðu kommununnar

Ár 1992, 4. november boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Tordi J. Niclasen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Hvørjar ítøkiligar ætlanir hevur landsstýrið at hjálpa kommunum, sum eru í fíggjarligari trongstøðu.

**Viðmerkingar:**

Fleiri kommunur kring landið eru sum kunnugt sera illa fyri fíggjarliga, soleiðis at tær í dag ikki klára at gjalda rentur og avdrátt av sínum lánum, og er tað tí ein spurningur, hvat fer at henda við hesum kommunum, sum ikki klára sínar skyldur.

Inntøkan hjá landinum hevur verið støðugt minkandi og inntøkan hjá kommunum tí tað sama.

Heilt einfalt er tað soleiðis, at peningur ikki í dag er tøkur til at gjalda lánini, sum tikin vórðu í "góðum" tíðum.

Hvat lánum til kommununar viðvíkur eigur at havast í huga, at landsstýrið, sum kommunalt eftirlit, hevur givið loyvi til øll hesi, og sostatt eigur medábyrgd av trongstøðuni, nógvar kommunur eru komnar í.

Summar kommunur hava beinleiðis stórar útreiðslur stavandi frá "landsíløgum". Her kann sum dømi nevnast Leirvíkar kommuna, sum árliga skal av við einar 2,5 -3 mió. kr. í rentum og avdrátti fyri ferjuleguna. Hetta kann ikki verða rætt móti borgarunum í hesi kommunu, tá hugsað verður um, at talan er um eina landsíløgu.

Onnur dømi kundu eisini verið nevnd.

Kommununar eru sera sárbarar hvat inntøkumøguleikum viðvíkur. Skatturin er stórt sæð tann einasta inntøkukeldan. Svíkur hesin, so er grundarlagið hjá kommunum at røkja sínar skyldur sera avmarkað.

Hjá landinum er støðan nakað øðrvísi. Umframt skattin, er talan um tollinntøkur, punktgjøld, MVG (eftir 1.1.1993) v. m.

Í tosinum um trongstøðu kommunnar hevur ymist verið frammi, t. d. hevur ljóðað at samanlegging skuldi verið loysnin, at broyta býtið millum land og kommunur, at "havnajáttanin" skuldi frigevast o.s.fr. o.s.fr.

Alt hetta tykist tó at hanga í leysari luft, og nú ta av álvara sansar at hjá fleiri kommunum, er tað spurningurin um ætlan landsstýrisins verður settur.

4. desember 1992 svaraði Jógvan Sundsstein, landsstýrismaður, fyrispurningunum soleiðis:

**Svar:**

Allarfyrst skal verða sagt, at formliga hevur landsstýrið onga skyldu at hjálpa kommunu, sum eru í trongstøðu.

Hinvegin er tað greitt, at landsstýrið sum politiskur myndugleiki ikki bara kann hyggja at vánaligu støðuni hjá kommununum. Tí verður roynt at gera heildarloysnir fyri allan kommunusektorin og ikki bara tilvildarligar løtuloysnir, sum kanska bara gera støðuna verri.

Tað, at landsstýrið í farnari tíð, serliga í áttatiárunum, sum kommunalt eftirlit, hevur givið loyvi til kommunala lántøku, hevur ikki við sær, at landsstýrið ábyrgist fyri lánunum hjá kommununum. Heldur ikki hevur landið serligar skyldur, útyvir tær, sum landið hevur goldið eftir galdandi reglum fyri ferjuhavnir og líknandi "landsíløgur".

Skiftandi bý- og bygdarráð hava beinleiðis ábyrgdina av fíggjarligu støðuni hjá teim ymisku kommununum, og komandi bý- og bygdarráð verða noydd at skipa so fyri, at hvør kommuna klárar sínar skyldur.

Nakað annað er, at kommunurnar eru partur av almenna sektorinum, og tí er tað ein politisk skylda hjá landsstýrinum at royna at skipa so fyri, at hesin partur í framtíðini fær ein karm at virka undir og harvið fortreytir bæði til at rinda sínar skyldur og virka fyri lokalsamfeløgini bæði menniskjansliga, mentunarliga, vinnuliga, umhvørvisliga og á annan hátt.

Út frá hesum hevur landsstýrið seinastu tíðina roynt at virkað fyri einum nýggjum og betri kommunustrukturi við betur greinaðum reglum fyri uppgávubýtinum millum landið og kommunurnar.

Landsstýrið setti ein arbeiðsbólk at arbeiða við hesum spurningi. Bólkurin legði fram fyribils álit í summar og bað um ábending frá landsstýrinum, hvussuleiðis víðari skuldi arbeiðast.

Tíverri hevur landsstýrið ikki verið fært fyri at taka avgerð í hesum spurningi og velja endaligu leiðina.

Kortini havi eg sum landsstýrismaður í kommunumálum roynt at arbeiða nakað ávegis í samarbeiði við ávísar kommunur og Føroya Kommunufelag.

Ítøkiliga kann nevnast, at landsstýrið ikki bert kann hyggja at, tá kommunur ikki rinda sína skuld. Tí hevur landsstýrið ávísan mun verið við og roynt at virka fyri gjaldsskipanum.

Samráðingar hava eisini verið við tríggjar kommunur í Norðoyggjum um at skipa eina royndarkommunu. Í slíkum føri skal nýtt uppgávubýti millum landið og hesa kommunu avtalast, herundir eisini ein blokkstuðulsskipan. Í hesum sambandi krevst ein broytt lóggáva.

Um ein slík royndarkommunuskipan fæst at virka, hava helst eisini aðrar kommunur áhuga fyri henni. Sostatt kann komandi 4 ára kommunuvalskeiðið verða eitt týðandi royndarskeið, sum førir okkum fram til ein betri kommunustruktur.

Spyrjarin sigur, at tað hevur ljóðað, at "havnajáttanin" skal frígevast til kommunumar. Eg havi borið uppá mál - og vil virka fyri, at tær lógásettu havnajáttanirnar verða frígivnar og goldnar kommunum yvir nøkur ár, um hesar vilja virka positivt í einum umleggingararbeiði. Men eisini hetta krevur lógarboyting og tá politiskan meiriluta, eins og ein møgulig landsyvirtøka av ferjulegum.

Fyri at vísa álvarsomu støðuna hjá kommununum leggi eg við tvær uppgerðir yvir lániskuld, inntøkur, útreiðslur, íløgur, skattaprosent v. m. hjá kommununum. Onnur av uppgerðunum er á enskum og er gjørd í samband við vitjanina hjá I.M.F. - umboðunum. Á hesi uppgerð er eisini eitt rað við "neyðugum" skattaprosenti. Hetta er roknað mekaniskt og er ikki at skilja sum endaligt, men meira sum ein ábending.

Men alt hetta tilfarið vísir, at støðan er álvarlig, og at bæði kommunalpolitikarar og landspolitikarar mugu arbeiða álvarsamt og skjótt fyri at skapa haldbarar heildarloysnir á økinum.

# 100-13. Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, um telefon- og skrivstovutíð hjá almannastovuni og arbeiðsloysisskipanini

Ár 1992, 7. november boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Niels Paula Danielsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Hvussu vil landsstýrið tryggja, at fólk sleppa ígjøgnum, sum hava ørindi til Almannastovuna og Arbeiðsloysisskipanina, og verða avgreidd eftir galdandi lógum?

**Viðmerkingar:**

Trýstið økist fyri hvønn dag, ið gongur, á almannastovuna og arbeiðsloysisskipanina. Alt fleiri og fleiri fólk verða uppsøgd, bæði í privatu vinnuni og hjá tí almenna, og gerast arbeiðsleys. Neyðin leikar á hjá mangari familju, sum onga aðra staðir hava at venda sær enn til arbeiðsloysistryggingina og til almannastovuna.

Men tað er ikki til at koma ígjøgnum hjá teimum, sum ringja t. d. til Arbeiðsloysistryggingina. Har er bundið allan dagin og alla vikuna, og tað er lítið mætari hjá almannastovuni, sum tó higartil hevur funnið fram til eina skipan, ið ger tað eitt sindur lættari at fáa samband við stovnin.

Tað er ikki óhugsandi, at trýstið á aðrar almennar stovnar gerst minni, tá ið Almannastovan og Arbeiðsloysisskipanin fáa so nógv fólk at taka sær av, og at hetta skuldi ført til nakrar sparingar fyri landskassan.

Men hvussu vil landsstýrið gera tað møguligt fyri fólk t. d. av bygd at koma í samband við Arbeiðsloysisskipanina og Almannastovuna, tá ið opið er frá kl. 10-12 og kl. 13-15 (Arbeiðsloysisskipanin kl 9-12 og stong mikudag), og tá ið telefonin alla hesa tíð er bundin.

22. desember 1992 svaraði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar:**

Hvat Almannastovuni viðvíkur, so má ásannast, at støðan i landinum hevur ført við sær, at eitt alsamt vaksandi trýst hevur verið á stovnin.

Móttøkan á høvuðsskrivstovu Almannastovunnar er mannað við 2 fólkum, sum sambært kanning - gjørda av telefonverkinum - hava úr at gera eg sum so dánt megna at taka ímóti fólki, sum møta persónliga ella ringja. Við hvørt er trýstið so stórt, at fólk, ið ringja inn, detta út aftur úr telefonkervinum, uttan at hava fingið samband. Høvuðstrupulleikin er at fáa fólk víðari til starvsfólk á teimum ymsu deildunum, tí hesar støðugt eru upptiknar, annaðhvørt av telefonsamrøðum ella samrøðum við fólk, sum møta persónliga.

Høvuðsdeildin í Tórshavn hevur roynt at skipa seg burturúr hesi støðu við at lata málsviðgera og skrivara taka telefonina til ymsar tíðir, fyri at royna at útvega viðskiftafólkinum samband við fólk, ið kenna mál teirra. Hetta hevnr bøtt um støðuna, men trýstið er framvegis ov stórt.

Hóast hetta, so merkja eysturoyingar og norðoyingar - serstakliga í hesum døgum - ein bata, nú miðfirringin er veruleiki og fólk í Suðurstreymi hevur alla tíðina havt lokala skrivstovu við avgerðarmyndugleika. Miðfirringin fevnir í løtuni bert um myndugleika í forsorgarmálum. Tó kunnu fyrispurningar um onnur mál nú eisini svarast á bygd, um "on-line" skipanina, um spurningarnir snúgva seg um kontantveitingar. Á einum øki fær føroyska viðskiftafólkið betri sømdir enn t. d. í Danmark og tað er viðvíkjandi atgongd til persónliga samrøðu við málsviðgera, har viðskiftafólk í Danmark mangan mugu bíða í vikur, meðan tey her kunnu koma inn frá gøtuni.

Arbeiðsloysisskipanin byrjaði sum kunnugt útgjaldingar sínar í august mánaði í ár. Skrivstovan er opin mánadag, týsdag, hósdag og fríggjadag millum kr. 09.00 og kl. 12.00 og millum kl. 13.00 og 15.00. Neyðugt er hjá stovninum at hava stongt ein dag um vikuna, soleiðis at starvsfókini fáa stundir at avgreiða mál og gera klárt til útgjald. Arbeiðsloysisskipanin arbeiðir í løtuni við at gera ein upplýsandi faldara, sum - tá hesin er liðugur - verður sendur í hvørt hús í Føroyum. Hesin faldari fer at svara nógvum av teimum spurningum, sum ringt verður inn um. Hetta fer at minka um trýstið á telefonirnar hjá skipanini.

# 100-14. Fyrispurningur til John Petersen, landsstýrismann, viðvíkjandi at uppkeypa skip við upphøggingarstuðuli úr einari sýslu í aðra

Ár 1992, 13. november boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi, frá Heina O. Heinesen, sum var soljóðandi:

Vísandi til løgtingslóg nr. 46 frá 30. mars 1990, § 4, og tilhoyrandi kunngerð nr. 55 frá 3. mai 1990 um upphøggingarstuðul skal undirritaði loyva sær at seta fram henda fyrispurning:

1. Hvat ætlar landsstýrið at gera við, at upphøggingarstuðul verður brúktur til at uppkeypa skip úr einari sýslu í aðra.

2. Er landsstýrið vitandi um, at tað er møguligt at uppkeypa 3 skip av so gott sum somu stødd og sama aldri fyri upphøggingarstuðulin, sum var fingin fyri tað eina skipið.

**Viðmerkingar:**

Í kunngerð nr. 55 frá 3. mai 1990 sigur landsstýrið: "Tá støða verður tikin til umsókn um stuðul, verða hesi viðurskifti havd í huga:

4) Hvar fiskifarið hoyrir heima, og hvar tað avreiðir.

Miðað verður eftir, at býtið av veiðuorku millum sýslumar verður minst møguliga broytt, tá upphøggingarstuðul verður veittur eftir hesi kunngerð."

Tað, sum hendir í dag, er, at menn, sum hava fingið upphøggingarstuðul útgoldnan, eru farnir at bjóða upp á skip í aðrari sýslu við hesum peningi. Hetta er í stríð við omanfyri nevndu kunngerð.

Sum dømi kann nevnast tað, sum hendi í fútarættinum, tá 3 línuskip í Klaksvík fóru undir hamaran. Tá varð upphøggingarstuðul brúktur at uppbjóða hesi skip.

Tað ljóðar, at viðkomandi er í samráðingum um at keypa hesi skip frá Føroya Banka, sum keypti tey í fútarættinum. Tað, sum landsstýrið kann skriva sær

aftanfyri oyrað, er, at tað er møguligt at keypa 3 skip fyri ta upphædd, sum er útgoldin í upphøggingarstuðuli fyri eitt skip.

30. desember 1992 svaraði John Petersen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

Í viðmerkingunum til fyrispurningin verður sipað til kunngerð nr. 55 um upphøggingarstuðul frá 3. mai 1990, har tað nærri er ásett, at miðast skal eftir "at býtið av veiðuorku millum sýslumar verður minst møguliga broytt, tá upphøggingarstuðulin verður veittur". Sambært hesum er landsstýrið bundið at leggja dent á, hvørji sýslu skipið kemur úr, tá upphøggingarstuðulin verður veittur. Hinvegin er einki ásett um, at landsstýrið skal treyta sær, at peningurin ikki verður nýttur til at keypa skip úr aðrari sýslu. Heldur ongar avmarkingar eru ásettar í lógini um, hvat stuðulin kann nýtast til. Landsstýrið sær sostatt einki beinleiðis lógleyst vera í, at upphøggingarstuðulin verður nýttur til at keypa skip úr aðrari sýslu.

**ad 1.** Út frá tí, sum her er sagt, ætlar landsstýrið ikki at gera nakað, tí landsstýrið fær ikki gjørt nakað við, hvat upphøggingarstuðulin verður nýttur til. Hetta mest tí tað ikki er møguligt at siga, at ávís peningaupphædd stavar frá upphøggingarstuðli.

**ad. 2.** Landsstýrið veit ikki um hetta, og kann hetta heldur ikki metast at vera uppgáva landsstýrisins.

# 100-15. Fyrispurningur til Svend Aage Ellefsen, landsstýrismann, viðvíkjandi siglingini hjá Teistanum

Ár 1992, 25. november boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Hergeir Nielsen, Flemming Mikkelsen, Henrik Old, Sverra Midjord, og Mikkjal Sørensen, løgtingsmonnum, sum var soljóðandi:

1. Hvi verður Teistin tikin norðuraftur til Havnar hvøja ferð, tá veðurmaðurin boðar frá harðveðri.
2. Vil landsstýrið syrgja fyri, at Teistin liggur á Vági, um so er, at hann vegna veður ikki fær ligði á Tvøroyri?

**Viðmerkingar:**

Tað er vorðið alt meiri vanligt seinastu vetrarnar, at Strandfaraskip Landsins í tíðindunum kl. 18.30 boða frá, at einki samband er norður um Suðuroyarfjørð morgunin eftir, tí at Teistin noyddist norðuraftur um kvøldið vegna veður.

Hetta verður ikki góðtikið longur, tí grundgevigin heldur ikki. Smyril, systurskip Teistans, hevur nærum ongantíð avlýst sigling vegna veður, og Teistin noyðist heldur ikki at gera hetta. Rættilig ódn er sjálvandi eitt undantak.

Um so er, at Teistin ikki fær pláss á Tvøroyri, ella har er ov ótrygt at liggja, so kann hann liggja á Vági. Har kunna skip liggja í øllum veðri, og lá t. d. Tjaldrið hjá Skipafelagnum nútt á Vági alla ta tíð, tað sigldi, uttan óhapp av nøkrum slagi. Haraftrar kann Vágsfjørður siglast so at siga í øllum vanligum veðri, eisini um illveður er - alt annað er ein umbering. Tað ber ikki til longur at seta fólk í óføri, bert tað verður boðað frá harðførum, men kortini vanligum vetrarveðri.

Fólk, sum skulu læknaørindi av landinum og sum annars hava tíðarásett ørindi, eins og flutningur av ymsum slagi, sum avtalaður er, eru fyri rættiligum vanbýti av hesum tilvildarligu avlýsingum frá Strandfaraskip Landsins.

Skilligt er, at eingin tekur skipara og manning av ræði, tá ið vandi er á ferð, men hinvegin, so liggja og hava øll før ligið í fleiri mannaminni fult so trygg og tryggari sunnanfyri Suðuroyarfjørð sum norðanfyri.

9. mars 1993 svaraði Svend Aage Ellefsen, landsstýrismaður, fyrispurningunum soleiðis:

**Svar**

Alt í einum, tá fyrispurningurin varð settur, boðaði undirritaði Strandferðsluni frá honum, og heitti á leiðsluna um at kunna skiparamar á "Teistanum" um tey viðurskifti, ið suðuroyartingmenninir føra fram í viðmerkingunum.

Samstundis sum biðið verður um umbering fyri, at svarið hevur drigið út, loyvi eg mær at vísa á, at fyrispurningurin sostatt helst hevur verið til nyttu fyri suðuroyarsiglingina, so sum hann ivaleyst hevur verið ætlaður.

Undirritaði er samdur við tingmonnunum, at tað er óheppið, at skipið verður lagt á Havnini, bert tí veðurmaðurin boðar frá harðveðri, og at skipið átti at kunna ligið antin á Tvøroyri ella í Vági í øllum vanligum illveðri. Hinvegin eru viðurskiftini viðvíkjandi tryggleikanum fyri skip og manning fult og heilt í hondunum á skiparanum, og landsstýrið hevur sjálvsagt ongar ætlanir um broytingar í so máta.

# 100-16. Fyrispurningur til Jógvan Sundstein, landsstýrismann, um bótarfør (solvent) virki, ið verða koyrd á húsagang

Ár 1992, 25. november boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Niels Paula Danielsen, løgtingsmanni.

Hvussu vil landsstýrið tryggja, at virki, ið eru bótafør (solvent), ikki verða koyrd á húsagang?

**Viðmerkingar:**

Nógv hoyrist um bæði virkir og sethús, ið verða lýst á tvingsilssølu í hesum døgum.

Tíverri frættist eisini um, at summi av hesum virkjum, ið verða koyrd á húsagang, ikki eru insolvent, men bótafør. Tá stingur ótryggleiki seg upp, sum hvørki vinnulív ella samfelag kann liva við.

Tað ræður um at skapa trygg kor fyri alt virksemi og steðga ristingunum, sum tað føroyska samfelagið er alt ov nógv plágað av í dag.

11. desember 1992 svaraði Jógvan Sundstein, landsstýrismaður, fyrispurningunum soleiðis:

**Svar:**

Tað er ein sannroynd, tíverri, at í dag eru mong virki, og mangir privatpersónar, í stórari fíggjarligari kreppu av berari likviditetsneyð. Hetta uttan at tey undir vanligum umstøðum vóru at rokna sum insolvent.

Tá ið her verður brúkt orðið "vanligum" umstøðum, er meint við láni- ella kredittmøguleikar, sum samsvaraðu virðismetingunum nøkulunda í samsvar við kostnaðarstøðið í samfelagnum.

Tað búskaparliga bakkastið, sum Føroyar hava verið úti fyri - og fyri ein stóran part umheimurin eisini - hevur havt við sær ein tørv á kapitali, sum ikki hevur verð nøktaður.

Hetta hevur aftur havt við sær lækkandi prísir á aktivum og versuandi arbeiðsumstøður hjá allari vinnuni.

Ikki minst hjá fíggingarstovnunum hevur hetta ført ótryggleika við sær, og tá ið so sjálv høvuðsvinnan verður rakt av rávørumangli, verður støðan upp aftur verri.

**Tað at Føroyar vórðu raktar av:**

1. Ov stórari nýtslu og tí alt ov høgari uttanlandsskuld
2. Ov stórum vøkstri av almenna sektorinum
3. Ov høgum kostnaðarstøði
4. Ov nógvum feilíløgum
5. Og til seinast rávørumangli

førdi við sær ta trongu støðu, vit eru í, tá rættast skuldi upp á viðurskiftini.

Spurningurin um, nær eitt virki ella ein persónur er insolventur, er ógvuliga trupul at avgera.

Konkurslógin gevur nakrar ávisingar, men tá ið saman um kemur, eru ymiskar umstøður avgerandi. Roknskaparliga kann roknast út, um eitt virki er bótaført ella ikki, men her eru metingar ógvuliga avgerandi.

Metingarnar byggja partvís á kostnaðin fyri viðkomndi aktiv, men meira á framleiðslumøguleikarnar, og framtíðarútlitini, og her kunnu meiningarnar vera so ymiskar. Vit síggja dømi um, at virki og tess ognir verða mett positivt ein dag, fyri bert stutta tíð aftan á at verða metta nógv lægri og kanska insolvent.

Dømi eru eisini um, at líknandi virkir verða mett ymiskt, alt eftir, hvørjar fíggingarkeldur tey hava, sjálvt um virkisgøgn teirra annars líkjast.

Í veruleikanum er spurningurin um bótaføri (solvens) støðutakan til umstøður - eisini skiftandi umstøður - t.v.s. ein meting gjørd av meira ella minni kønum fólki. Við í hesa meting koma viðurskifti sum: Kostprísur, eftirspurningur, útboð, fíggingarmøguleikar, konjunkturir, útlit, vitan, áhugamál, vilji ella óvilji, og í seinasta lagi spurningurin um dømievni hjá lángevara eila kreditori.

Landsstýrið kann ikki tryggja, at virki, sjálvt um tey eru bótafør, ikki verða koyrd á húsagang. Tað, landsstýrið kann gera og roynir at gera, er at bøta aftur um búskaparligu viðurskiftini í landinum, soleiðis at so fá sum møguligt verða trongd av vánaligum umstøðum. Men fyri at hetta skal eydnast, krevst, at allir partar av samfelagnum ásanna tað neyðuga í hesum.

# 100-17. Fyrispurningur til Jógvan Sundstein, landsstýrismann, um pengar til Arbeiðsloysisgrunnin

Ár 1992, 17. november boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Niels Paula Danielsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Hvussu vil landsstýrið útvega nóg mikið av pengum til arbeiðsloysisgrunnin.

**Viðmerkingar:**

Talið av teimum arbeiðsleysu økist í hvørjum og hevur ongantíð verið so stórt, sum tað er í dag.

Tað eru bara 5 mánaðir, síðan Arbeiðsloysisskipanin fór at virka og gjalda út 14. hvønn dag. Við seinastu útgjalding fingu 2.419 fólk fullan stuðul og 1285 lutvísan stuðul frá skipanini. Saman við teimum 800, sum einki fáa frá Arbeiðsloysisskipanini, tí at tey onga lønarinntøku hava havt tey seinastu 3 árini, og tí noyðast at fara til forsorgardeildina hjá almannastovuni, er talið á teim arbeiðsleysu nú komið upp á í minsta lagi 4.504. Hetta er 20,5% av tí samlaðu arbeiðsmegini í Føroyum, sum er sett til 22.000 fólk.

Trýstið á arbeiðsloysisgrunnin er nú vorðið so stórt, at meiri fer úr grunninum enn kemur í hann.

Menn eru tí av álvara famir at stúra fyri, hvaðan ið grunnurin skal fáa pengar sínar í 1993.

Tær 20 mió., sum grunnurin fekk játtaðar úr landskassanum 1992, eru uppbrúktar eins, og tey 2%, sum koma í grunnin frá øllum løntakarum og øllum arbeiðsgevarum, eru ikki nóg mikið.

Vil landsstýrið koma við eini eykajáttan til Arbeiðsloysisgrunnin? Ella ætlar landsstýrið at koma við einum uppskoti um at hækka gjaldið hjá arbeiðsgevarum og/ella løntakarum, sum frammanundan knógva undir øðrum tungum avgjøldum, eykaskatti v.m.

Møguleikin at avtaka lógina um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin og flyta 1/2%, sum løntakarar og arbeiðsgevarar rinda í henda grunn, hevur eisini verið nevndur.

Einki verður sagt um, hvussu landsstýrið ætlar at útvega Arbeiðsloysisgrunninum teir pengar, sum koma at resta í, hvørki í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 1993 ella eykafíggjarlógaruppskotinum fyri 1992, sum lagt er fyri tingið.

Tí verður hesin spurningur settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum.

13. januar 1993 svaraði Jógvan Sundstein, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar:**

Fyrst er at siga, at spurningurin av røttum átti at verið settur landsstýrismanninum í arbeiðsmarknaðarmálum. Men tá ið løgtingið hevur samtykt, at eg skal svara honum, skal eg eisini eftir førimuni royna at gera tað.

Rætt er, at nógvur peningur verður útgoldin frá Arbeiðsloysisskipanini, og at arbeiðsloysið er eitt tað størsta vandamálið í føroyska samfelagnum beint nú.

Arbeiðsloysistryggingin er skipað í 1992 og er eitt úrslit av samarbeiði millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum. Burtursæð frá 20 mió. kr., sum landkassin rindaði grunninum, tá hann byrjaði, rindar arbeiðsmarknaðurin øll gjøld til skipanina.

Hendan skipanin eigur at halda fram, soleiðis at partarnir á arbeiðsmarknaðinum við nevndini fyri grunnin stjórna gongdini hjá skipanini, bæði við at áseta inngjaldingarprocentið og útgjaldingarupphæddina og mannagongdina annars.

Landsstýrið fer tí framyvir eisini at virða, at tað eru partarnir, sum hava ábyrgdina av Arbeiðsloysisinsskipanini, men støða grunnsins verður kortini viðgjørd í landsstýrinum saman við ymiskum uppskotum, sum nevnd grunnsins er komin við.

# 100-18. Fyrispurningur til Svend Aage Ellefsen, landsstýrismann, um ferðafólkaflutning millum Skálafjørðin og Havnina

Ár 1992, 17. desember boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Dan Petersen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Hvørja ætlan hevur Svend Aage Ellefsen, landsstýrismaður í samferðslumálum, um skjótan og tryggan flutning av fólki við Skálafjørðin, sum morgun og kvøld ferðast til og frá Havnini í arbeiðs- og lestrarørindum, nú Dúgvan sær út til at missa sína játtan á nýggjárinum 1993. Somuleiðis verður spurt um møguleikarnar hjá tí tungu ferðsluni sjóvegis eftir árslok 1992.

**Viðmerkingar:**

Nú tað liggur á ljóði, at Dúgvan skal takast úr Skálafjarðarsiglingini, kenna fólk, ið brúkt hava hesa rutu, seg ótrygg.

Tað var Mjólkaforsýningin, sum í 1908 skipaði fast samband millum um Havnina og Skálafjørðin. Hetta skjóta og trygga samband hevur elvt til, at rættiliga fitt av fólki hevur fingið sær starv í Havnini, men býr heima. Talið á teimum, ið ferðast fast morgun og kvøld, hevur ligið um 115, og hevur, síðani Streymoyarberholið varð tikið í brúk, verði 80 ferðandi. Tað er ikki siðvenja í Føroyum at ferðast til og frá arbeiði í tveir tímar, sum tað jú kemur at taka av Toftum og Strondum til Havnar við Bygdaleiðum.

Verður rutan Tórshavn - Skálafjørð niðurløgd, fer hetta at føra við sær, at hesi fólk verða kastað út í arbeiðsloysi. Sera álvarsamt, tá vit hava í huga, at bæði Toftir og Strendur liggja í arbeiðsloysi, nú Nykur og Bátafisk liggja still.

Havast skal eisini í huga, at Eysturoyggin teknar seg fyri 40% av landsins framleiðslu og hevur eitt sjálvsagt krav til skjótan flutning, eisini av tungari ferðslu.

Fyrireikingar verða í hesum døgum gjørdar til gólvuppboðssølu á Toftum. Ein fortreyt fyri hesum nýggja tiltaki er regluligt samband sjóvegis til og frá Toftum.

Alt hetta nevnda er orsøk til, at hesin fyrispurningur verður settur.

14. januar 1993 svaraði Svend Aage Ellefsen, landsstýrismaður, fyrispurningunum soleiðis:

**Svar:**

Til spurningin er at siga, at tá fíggjarlógaruppskotið (2. framløga) varð tilevnað í oktober í fjør, skuldu 60 mió. kr. samanlagt sparast á grein 13, "samferðsla og samskifti" í mun til uppskotið frá august.

Tí varð eisini neyðugt at skera munandi niður í játtanini til Strandferðsluna, við tí úrsliti, at strandfaraskipini í ár skulu klára seg við einum ískoyti upp á tilsamans 23 mió. kr. móti 37 mió. kr. á fíggjarlógini (og 46 mió. kr. á eykafíggjarlógini) fyri 1992.

Á fundi í fíggjarnevndini í sambandi við nevndarviðgerðina av fíggjarlógaruppskotinum kunnaði undirritaði fíggjarnevndina um, at ongir pengar vóru avsettir í teimum 23 mió. kr. til eitt væntað halla av at reka siglingina hjá Dúgvuni í 1993, eins og pengar heldur ikki eru avsettir til m. a. uttanlandasiglingina hjá m/f Smyrli.

Ein av orsøkunum til, at játtanin til skálafjarðarsiglingina er burturskorin, er, at nýggja Kollafjarðarbergholið lættir um koyringina millum Tórshavn og m. a. Eysturoynna, og at tørvurin á sjóvegis farleiðini tí helst minkar samsvarandi.

Undir triðju viðgerð av løgtingsfíggjarlógini samtykti tingið soljóðandi viðmerking til grein 13265 Strandfaraskip Landsins: "Ferðasambandið sjóvegis Skálafjørður/Tórshavn heldur fram, til landsstýrið hevur funnið aðra loysn á málinum."

Út frá hesi samtyktini kann staðfestast, at løgtingð samtykkir í, at "onnur loysn" verður funnin, hvat røkt av sambandinum millum Skálafjørðin og Tórshavn viðvíkir, heldur enn at játta Strandferðsluni pengar at røkja eina framhaldandi sigling við m/f Dúgvuni fyri.

Undirritaði hevur tí tann 8. januar havt fund við umboð fyri nývaldu bygdarráðini við Skálafjørðin, og boðað teimum frá, at peningur ikki er játtaður til framhaldandi sigling.

Á fundinum varð Dúgvan boðin kommununi til leigu í eina royndartíð, so siglingin ikki varð niðurløgd. Leigumálið kundi verða ókeypis, tó soleiðis, at skipið í so fall skal viðlíkhaldast bæði væl og virðiliga. Biðið varð um svar skjótast gjørligt, tí um bygdarráðini ikki tóku av, varð ætlanin at leggja Dúgvuna komandi vikuskifti.

Eftir at eysturoyartingmenn hava havt fund við bygdarráðini, er áheitan komin um at leingja freistina, og er tí avrátt við Strandferðsluna, at Dúgvan verður siglandi januar mánaða út, ímóti at Strandferðslan fær eykajáttan uppá kr. 125.000,-. Peningurin verður fluttur av konto nr. 13106 landsstýrinum at ráða yvir.

Eftir standa tvinnir kostirnir. Antin yvirtaka kommunurnar ella onnur siglingina, ella játtar løgtingið Strandferðsluni pengar til framhaldandi rakstur av Dúgv-

uni. Verða báðir kostirnir havnaðir, hevur landsstýrið ikki annað val enn at leggja skipið 31. januar.

Verður Dúgvan løgd, fyriliggur ætlan at skipa beinleiðis bussrutu millum Skálafjørðin og Havnina. Sambært ætlanini verður koyrt fleiri ferðir dagliga uttan av Toftum. Steðgað verður bert fáar ferðir inn til Skálabotn, har bussamband verður við Skála og Strendur og hagandi koyrt verður uttan steðg til Havnar. Tilsvarandi verður koyrt úr Havnini inn til bygdirnar kring Skálafjørðin.

Tá talan stórt sæð er um umskipan av bussleiðunum og t.d. eingin bussur aftrat skal í skipanina, verður meirkostnaðurin av busskoyringini einans kr. 300.000,- árliga. Treyðugt so at ikki meirinntøkurnar geva javnvág.

Um Dúgvan verður løgd, má tunga ferðslan flytast eftir vegakervinum.

Sjálvsagt verða tað nøkur, ið heldur vildu, at Dúgvan helt áfram at sigla, men tað burdi verið púra greitt fyr teimum flestu, at tað ikki kann bera til at kuta forbrúkið hjá Strandfersluni (incl. Tyrlutænastuna) úr 74 mió. kr. í 1989, 65 mió kr. í 1990, 55,4 mió kr. í 1991, 51,0 mió. kr. í 1992 til 28 mió. kr. í 1993, hetta uttan at tað kennist aftur í tænastustøðinum bæði her og har.

# 100-19. Fyrispurningur til Maritu Petersen, løgmann, viðvíkjandi viðurskiftum innan almannaumsitingina í Føroyum

Ár 1993, 22. mars boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Tordi J. Niclasen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Hvat er í veruleikanum farið fram innan landsstýrið/almannastovu, nú tænastumaður einsamallur tykist at taka avleiðingar av viðurskiftum, sum ábyrgdast hjá politiska myndugleikanum?

**Viðmerkingar:**

Í samband við Grannskoðaradeild Landskassans hevur latið úr hondum frágreiðing um almannaútreiðslurnar fyri árið 1991, hava nógvir ivaspurningar tikið seg upp einamest stavandi frá, at almannastjórin fór úr starvi og varð settur í annað starv í landsumsitingini.

Hvat sjálvari frágreiðingini frá Landsgrannskoðaranum viðvíkur, verður ov drúgt at fara í æsir, og skal tí bert partur av niðurstøðuni verða tikin við, nú spurningur um avleiðingar av hesi frágreiðing verður settur løgmanni.

Í niðurstøðuni verður m. a. sagt: "Det må sammenfattende siges, at der inden for administrationen af det sosiale lovkompleks på Færøernes er en række fundamentale problemer, som hidrører dels fra selve lov/regelgrundlaget, dels fra de administrative systemer, blandt andet forårsaget af en utilstrækkelig ressourceindsats i forvaltningen af området og en uklar opgavefordeling mellem Almannastovan og landsstyret..... Efter landsrevisionens opfattelse er den væsentligste årsag til problemerne i forbindelse med lov- og regelgrundlaget, at skiftende landsstyrer ikke i tilstrækkeligt omfang har sørget for den nødvendige ajourføring heraf....."

Frágreiðingin tykist at koma óvart á føroyskar eins og danskar myndugleikar. og aftur vórðu Føroyar í danska fjølmiðlamiðdeplinum. Ein avleiðing frá danskari politiskari síðu er, at tað, sum áður á hesum øki er goldið sum refusión, nú skal í blokkin.

Ein onnur avleiðing - frá føroyskari politiskari síðu - er, at almannastjórin varð "sagdur" úr starvi.

Avgerðin, ið landsstýrið tók, hevur undrað mangan og tykist tað her, at "bakari er avrættaður fyri smið".

Tað tykist sum politiski myndugleikin hevur sloppið sær undan ábyrgd og latið tænastumann tikið brotið.

Løgmaður hevur ábyrgd fyri tinginum at umsita beint og forsvarliga, og tá nú ivi um mannagongdina í hesum máli hevur tikið seg upp - ivi eisini stavandi frá landsstýrismonnum og umsitingini sjálvari, er tað umráðandi, at løgmaður gevur tinginum eina nøktandi frágreiðing.

26. mars 1993 svaraði Marita Petersen, løgmaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

Í viðmerkingunum verður víst til partar av niðurstøðuni í frágreiðingini frá landsgrannskoðaranum um roknskapin hjá almannaverkinum fyri árið 1991, serstakliga at trupulleikarnir eftir áskoðan landsgrannskoðarans stava frá "dels selve lovregelgrundlager, dels fra de administrative systemer, blandt andet forårsaget af en utilstrækkilig ressourceindsats i forvaltningen af områder og en uklar opgavefordeling mellem Almannastovan og landsstyret".

Eg eri samd við spyrjaran um, at av drúgvført verður her at viðgera grannskoðanarfrágreiðingina út í æsir og allar hesar spurningar, men grannskoðanarfrágreiðingin verður seinni løgd fyri tingið til góðkenningar og fáa løgtingsmenn, tá høvi at viðgera málið nærri.

Í viðmerkingunum verður víst á, at trupulleikarnir hava fört við sær, at danir krevja, at refusiónin á almannaøkinum verður umskipað til generellan blokkstuðul. Hetta er ikki rætt, tí longu í avtaluni millum landsstýrið og donsku stjórnina 1. februar 1993 verður sagt, at samráðingar skulu fara fram við tí fyri eyga, at refusiónin verður løgd um til blokk.

Hvat viðvíkur fyrrverandi stjóranum á Almannastovuni er støðan tann, at hann er loystur úr starvinum sum stjóri á Almannastovuni eftir egnum ynski orsakað av innihaldinum í frágreiðingini.

Tordur Niclasen biður í viðmerkingunum til spurningin um eina nøktandi frágreiðing um, hvussu varð farið fram, tá Tommy Petersen varð loystur úr starvi sum stjóri á Almannastovuni.

Eftir at landsstýrið hevði fingið frágreiðingina frá landsgrannskoðaranum til kunningar, viðgjørdi landsstýrið - almanna- og heilsudeildin málið í døgunum aftaná, og varð spurningurin um, hvørjar umsitingarligar broytingar vóru neyðugar, eisini viðgjørdur.

25. februar handaði almanna- og heilsudeildin mær og Jóannesi Eidesgaard, landsstýrismanni, eitt notat um grannskoðarnarfrágreiðingina. Í notatinum varð spurningurin um eina møguliga tænastumannakanning nevndur.

Sama dag høvdu eg og Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fund við Tommy Petersen, fyrrverandi almannstjóra, um málið, og varð úrslitið av hesum fundi tað, at Tommy Petersen søkti um at verða loystur úr starvi treytað av, at hann fekk annað starv innan umsitingina. Hann vísti í hesum sambandi á, at eiu slík framferð var nýtt fyrr í slíkum málum.

Mett varð, at landsstýrið átti at taka avgerð í hesum máli sum skjótast, og varð tí roynt at fáa fatur á hinum landsstýrismonnunum, men tíverri fingu ikki allir boð.

Undirritaða, sum havi ábyrgdina av starvsfólkamálum, og landsstýrismaðurin í almannamálum, sum hevur fakliga ábyrgd av økinum, kundu ganga inn fyri at játta umsóknini frá Tommy Petersen, og eftir at hava tryggjað okkum, at meiriluti var í landsstýrinum fyri umsóknini, varð Tommy Petersn loystur úr starvinum sum almannastjóri og varð settur sum løgfrøðisligur ráðgevi hjá landsstýrinum.

Hóast notatið frá almanna- og heilsudeildini ikki varð býtt út til hinar landsstýrismenninar, varð spurningurin um tænastumannakanning viðgjørdur, áðrenn avgerðin tann 25. februar varð tikin. Teir 4 landsstýrismenninir, sum tóku avgerðina, vóru samdir um, at ein tænastumannakanning tænti ongum endamáli.

Tað varð ikki hildin formellur landsstýrisfundur um málið fyrrenn dagin eftir, tá tað varð samtykt við 4 atkvøðum fyri. Eg viðgangi, at endalig avgerð ikki átti at verið tikin fyrrenn á landsstýrisfundinum tann 26. februar, men eri eg ikki í iva um, at avgerðin er lóglig og bindandi, og hon er eftir mínari meting tann einasta, vit kundu taka við støði í notatinum frá almanna- og heilsudeildini og tilmælinum frá lønardeildini í Tinganesi.

# 100-20. Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, viðvíkjandi útreiðslum í samband við ættleiðing

Ár 1993, 22 mars boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Tordi J. Niclasen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Hevur landsstýrið nakrar ætlanir um at lætta um ættleiðingarútreiðslur við t. d. donsku lógini um ættleiðingarískoyti sum fyrimynd?

**Viðmerkingar:**

Av ymiskum orsøkum eru tað ikki so fá, sum tey seinnu árini hava ættleitt børn uttanlendis.

Ríkisumboðið umsitur ættleiðingarskipanina fyri Føroyar.

Talið á børnum, sum eru ættleidd, hevur ligið um eini 15-20 árliga. Talið tykist nú at vera fallandi.

Útreiðslurnar í samband við ættleiðing eru ikki so fáar og stava hesar frá læknakanningum, vaccinatiónum, fyristing, ferðaseðlum og uppihaldi.

Útreiðslurnar kunnu soleiðis lættliga gerast um 100.000 kr., tó veldst nakað um, úr hvørjum landi barnið/børnini verða ættleidd.

Sum er, bera ættleiðingarforeldrini allar útreiðslurnar sjálvi - eisini tær læknaligu her heima - og er skipanin her á landi sostatt øðrvísi, enn hon er eitt nú í Danmark, har ávíst ættleiðingarískoyti verður veitt teim, ið ættleiða.

Fyri trimum árum síðani varð hetta ískoytið sett í verk við kr. 15.000.

1. januar 1993 varð ískoytið hækkað til kr. 30.000.

Tað tykist órímiligt, at skipanin í Føroyum er so nógv øðrvísi enn skipanin í Danmark, og verður tessvegna spurt, um landsstýrið hevur ávísar ætlanir á hesum øki.

14. apríl 1993 svaraði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

Í juli 1991 vendu umboð fyri foreldur, ið ynskja at ættleiða børn uttanlands, sær til landsstýrismannin við fyrispurningi um, hvørji útlitini eru fyri, at fólk búsit-

andi í Føroyum kunnu fáa stuðul frá tí almenna í sambond við ættleiðing av barni.

Landsstýrið tók spurningin upp, og fekk frá Ríkisumboðsmanninum upplýsingar um, hvørjar skipanir eu galdandi í hinum norðurlondunum.

Ætlan landsstýrisins var, at uppskot til løgtingslóg um stuðul í samband við ættleiðing uttanlands skuldi leggjast fyri løgtingið, og í samband við fíggjarlógaruppskotið fyri 1993 at skjóta upp, at ein upphædd upp á kr. 200.000,- varð játtað á fíggjarlógini 1993.

Við hesum var tað ætlan landsstýrisin, at forledur skuldu fáa kr. 10.000, - í stuðli frá landskassanum í samband við ættleiðing uttanlands. Stuðulin skuldi veitast uttan mun til inntøku og skuldi verða rindaður, tá barnið var komið til Føroyar. Av tí at tað tá vóru ættleidd umleið 20 børn um árið, varð roknað við eini árligari útreiðslu upp á kr. 200.000,- í hesum sambandi.

Sum búskaparliga støðan gjørdist í 1992, varð hendan ætlanin slept, av tí at tað ikki tóktist gjørligt innan verandi fíggjarkarm á § 19 í fíggjarlógini at finna pening til hetta endamálið.

Landsstýrið setti í 1992 ein arbeiðsbólk at endurskoða alla almannalóggávuna í Føroyum. Ætlan landsstýrisins hevur verið, at stuðul í samband við ættleiðing eisini átti at verða tikin til umhugsunar í samband við hetta byrjaða arbeiðið at endurskoða alla almannalóggávuna í Føroyum.

Nú útlit eru fyri, at alt almannaøkið skal undir blokkstuðulsskipan longu frá 1. juli 1993, má av hesi orsøk skundast undir arbeiðið við gerð av nýggjari lóggávu inna økið. Roknast kann tó ikki við at hesar nýggju almannlógirnar verða lidnar fyrrenn um eini 2 ár.

Landsstýrið hevur sum er ikki aðrar ætlanir at fremja serlig stuðulstiltøk í sambband við ættleiðing.

# 100-21. Fyrispurningur til Maritu Petersen, løgmann, um Kósavirkið og Føroyagrunnin frá 1971

Ár 1993, 16. mars boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Niels Paula Danielsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Hvat ger landsstýrið fyri, at Kósavirkið verður latið upp aftur og tikið verður ímóti fiski í Klaksvík og hvat vil landsstýrið við Føroyagrunninum frá 1971, sum eigur nógv hin størsta partin av partabrøvunum í p/f J. F. Kjølbro, og sum verður stýrdur av 4 limum, ið landsstýrið tilnevnir.

**Viðmerkingar:**

Lidnar eru 3 vikur, síðani Kósavirkið gavst at taka í móti fiski og varð selt á tvingsilssølu sjálvan 106 ára føðingardagin hjá Jógvan Fr. Kjølbro hin 25. februar. Danskur lánsstovnur keypti virkið, ið hevur ligið stilt síðan.

Tað hevur ljóðað, at bygnaðargrunnurin (strukturfonden), sum landsstýrið og løgting í samjuni við donsku stjórnini hin 1. februar bundu seg til at seta á stovn, hevur til endamáls at minka um talið av flakavirkjum í Føroyum.

Í samrøðu við Kristeligt Dagblad hin 11. mars 1993 nevnir løgmaður arbeiðið hjá hesum grunni og sigur: "Jeg kan godt frygte for, at vi ender med måske kun 4 af vores nuværende 18 filétfabrikker."

Fólk í Norðoyggjum spyrja nú, um landsstýrið veruliga ætlar, at Kósavirkið skal verða niðurlagt og ikki koma í gongd aftur, ella um Kósavirkið er eitt av teimum 4 virkjunum, sum landsstýrið vil, skal halda fram.

Tað er einki at taka seg aftur í, at Kósavirkið er tað best egnaða virkið til flakaframleiðslu í Føroyum við stórari gólvvídd, høgum lofti og framúr góðum upp- og avskipingarmøguleikum.

Tí tykist tað mongum ógvuliga løgið, at júst hetta virkið í dag er afturlatið og hevur verið tað nú í 3 vikur, meðan onnur virki við nógv størri skuld og færri møguleikum verða hildin opin, sjálvt um eisini tey hava rent seg fíggjarliga føst.

Landið eigur nógv hin størsta partapeningi í p/f J. F. Kjølbro, og landsstýrið tilnevnir teir 4 limirnar í Føroyagrunninum frá 1971, sum í dag stýra fyritøkuni saman við nevnd og stjóra.

Tí er tað, at tann spurningurin tekur seg upp, hvat ið landsstýrið vil við Føroyagrunninum frá 1971 og øllum partafelagnum J. F. Kjølbro.

13. mai 1993 svaraði Marita Petersen, løgmaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar:**

**ad 1:** Landsstýrið heldur, at roynt eigur at verða at fáa so nógv flakavirki í gongd aftur sum gjørligt, og at hetta eigur at verða gjørt so skjótt sum møguligt. Ein realistiskt ætlan hevur verið heildarsaneringsætlanin, sum Fíggingargrunnurin frá 1992 hevur lagt fram.


Eitt skifti var ivi um, um Kósavirkið fór at vera við í hesi heildarsaneringsætlan, men virkið er nú farið í gongd aftur uttanum hesa saneringsætlan.

Ein privat fyritøka, hvørs eigarar eru Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag og Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag, hevur leigað Kósavirkið frá fíggingarfelagnum IRF. Virkið byrjaði at taka í móti fiski aftur 1. mai.

**ad 2:** Nevndin fyri Føroyagrunnin og nevndin fyri J. F. Kjølbro og dótturfeløgini hava sum arbeiðssetning at fáa so nógvar sum gjørligt av fyritøkunum innan Kjølbrokonsernina at halda fram á vanligum haldilsligum grundarlagi.

Nevnast kann, at Føroyagrunnurin hevur stovnað eitt nýtt partafelag, JFK Trol, fyri at tryggja, at saltfiskatrolararnir ikki skuldu fara av landinum í samband við truplu fíggjarstøðuna hjá Kjølbrokensernini. Hetta varð gjørt í samráð við lánsveitararnar hjá Kjølbrokonsernini.

RED: 10 X



Nasjonalbiblioteket

**Nasjonalbiblioteket**
National Library of Norway
Rana Division
N-8607 Mo i Rana
Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12 12 22

